Orsøkin er at tey framdu tiltøkini hava gjørt okkum førar fyri at umvera peningatilskot frá lántøku uttanifrá fyri at reka og viðlíkahalda samfelagið. Men tiltøkini bøttu ikki so mikið um, at vit kundu gjalda rentur og kurstap av teimum lánum sum longu vóru upptikin - fyri ikki at tala um avdráttir.

Rentur og kurstap av uttanlandsskuldini frá 1980 kosta tey 3 árini 1981, 1982 og 1983, millum 650 og 700 milj. kr.

Hesar útreiðslur verða debiteraðar okkum, og skuldin veksur »heilt automatiskt« við hesari upphæddi uttan at eitt oyra afturat kemur í kassan, til nýtslu ella til fløgur.

Umframt at økjast við rentum og kurstapi kemur uttanlandsskuldin at økjast vegna keyp av teimum stóru farmaskipunum, eins og keyp at Reynsatindi og Norrønu. Hetta kann ikki undra nakran. Embætismenn gjørdu upp, at skuldin var stór, tá samgongan byrjaði, og skuldin er sum sagt víðari økt við rentum og kurstapi. Tá kann ein ikki keypa nógv stór og dýr skip uttan at koma at skylda enn meira.

## Skattamál

Lógin um samtíðarskatt er samtykt á tingi. Hon verður lýst ein av døgunum, men kemur ikki í gildi, fyrr enn eftir kunngerð frá landsstýrinum.

Enn er eftir at gera lóg um skattastigan, frádráttir v.m. og lóg um skiftisreglur fyri árið 1983. Uppskot til hesar lógir verða løgd fyri tingið í hesi tingsetu.

Sáttmalin millum Føroya Landsstýri og allar peningastovnarnar um skattainnkrevjingina er undirskrivaður.

Tingið hevur samtykt at seta partapening í P/f Elektron, sum

peningastovnarnir eiga í felag, og sum tryggjar landsstýrinum ein nevndarlim.

Arbeitt verður alsamt fram ímóti at samtíðarskattur verður settur í verk 1. jan. 84.

Meðan tað hevur eydnast at hildið lønarvøkstrinum á ríminligum støði, so er talan um munandi inntøkuvøkstur hjá pensiónistum.

Verandi skattaskipan førir við sær, at júst pensiónistar, orsakað av hesum lønarvøkstri, eru hækkaðir serliga nógv í skatti, meira enn rímiligt er.

Landsstýrið fer undir øllum umstøðum áðrenn næsta skattalíkning at leggja fram uppskot um broytingar í skattingini av pensiónistum.

Serligur dentur verður lagdur á, nú vit nærkast nýggjari skattaskipan, at fáa útistandandi skattin inn. Peningur er tøkur á núgaldandi fíggjarløgtingslóg til tað eykaarbeiði, sum stendst av hesum.

## Tollmál

Landstýrið hevur nú í eina tíð arbeitt fram ímóti eini nýggjari tolllóg, sum byggir á hina sonevndu CCCN-vøruskránna, og sum flest øll framkomin lond nýta í dag. Tað hevur m.a. hagfrøðiligar fyrimunir at nýta somu vørubólking, sum onnur lond. Men at gera eina nýggja tolllóg er drúgført arbeiði og enn kann ikki sigast við vissu, nær uppskotið er greitt at leggja fyri tingið. Ímeðan verður arbeitt við uppskoti til broytingar í galdandi tolllóg, broytingar sum bera fram ímóti áðurnevndu vørubólking og sum tillaga okkara tollóg við tilsvarandi í okkara grannalondum. Soleiðis er ætlanin at taka motorakfør burtur úr tollógini og gera lóg um skrásetingargjald fyri motorakfør. Uppskot um hetta verður lagt fyri tingið í hesi tingsetu. Tingið feldi uppskot landsstýrisins um transitt- og frígoymslu. Hin vegin samtykti tingið at gera broytingar í galdandi tolllóg, sum lógfestir transitt og gevur ávísar møguleikar til at veita tollendurgjald við endurútflutning.

Tann parturin av tollavgreiðsluni, sum higartil er farin fram í Danmark, nevniliga av postsendingum, er verðin fluttur higar heim. Hetta er í tráð við fíggjarlógarsamtykt.

## Fiskivinna

Okkara høvuðsvinna hevur ikki enn vunnið á trupulleikunum, og tí hava vit aftur í ár avsett 210 milj. kr. til at endurrinda fiskivinnuni í inniverandi fíggjarári.

Í hvønn mun játtanin á figgjarlógini 83/84 fer at halda er trupult at spáa um, tá veiðumynstrið er ólíkt tí, sum vit hava sæð seinastu árini.

Vit hava á føroyaleiðini fiska 35% meira higartil í ár, sammett við sama tíðarskeið í fjør.

Meðan so at siga eingin vøkstur er í upsafiskiskapinum, so er nøgdin av toski tvífaldað, hýsa er økt við 20%, kongafiskur við 36%, blálonga við 59%, svartkalvi við 130%, meðan so at siga øll hini fiskasløgini eru óbroytt.

Tann økti fiskiskapurin hevur serliga verið hjá trolarunum, meðan línu- og útróðrarflotin er eins illa fyri, sum hann hevur verið seinastu árini.

Úrslitið er m.a. at TAC fyri tosk 1983, 25.000 tons, longu er uppfiskað. Orsøkin til stóra toskafiskiskapin er partvíst, at torført var í vár hjá trolarunum at sleppa av við upsa, og fordi hetta við sær, at trolararnir løgdu seg meira eftir at fiska tosk í staðin. Hin parturin av orsøkini er, at toskafiskiskapurin hevur verið nógv betri í ár, enn seinasta ár.

Okkara fiskifrøðingar upplýsa, at gýtingin í ár var góð bæði fyri tosk, hýsu og upsa. Eisini hava teir sæð nógvan sildamurt, men enn er ov tíðliga at siga nakað um, hvønn týdning hetta kann fáa.

Aftur í ár verða nakrar praktiskar fiskiroyndir gjørdar. Játtaðar eru 5,5 milj. kr., sum skulu nýtast til: royndir við flatfiskatroli, royndarfiskiskap við rúsum eftir krabba og rundum fiski á djúpum vatni, royndir eftir makreli við gørnum, trolroyndir eftir gulllaksi, partroling eftir svartkjafti, høgguslokkaroyndir, royndir eftir vørpuskel (stór Jákupsskel), línuroyndir á Miðatlantiska Rygginum og royndir við snurruvág. Landsstýrið og figgjarnevndin hava samtykt at játta pening til royndir við snarkøling av feskum fiski. Ætlanin er at seta eina linju upp umborð á »Margrethu« og verða royndirnar fylgdar upp á flakavirkinum Klyvar í Nólsoy. Heilsufrøðiliga Starvstovan stendur fyri hesum royndum. Hetta verður gjørt fyri at bøta um góðskuna.

Landsstýri hevur arbeitt víðari eftir tí notati, sum lagt varð fyri Løgtingið um svartkjaftaveiðu og viðgerð bæði á sjógvi og landi.

Vit hava nú fingið eitt fabriksskip afturat til hesa veiðu. Skipið er í løtuni á Skála til umbyggingar. Ætlanir eru, sum nevnt aðrarstaðni, at umbyggja Vestmanna Fiskaviki til svartkjaftavirki. Eisini er gjørd roynd við partroling eftir svartkjafti við smærri trolarum, hesar

kanningar halda fram í heyst.

Royndir at fiska gulllaks eru gjørdar av Magnus Heinasyni og nú verður skip leigað at trola eftir hesum fiski á djúðum vatni við Føroyar.

Eisini verða gjørdar royndir at fáa meir burtur úr teimum møguleikum, sum vit higartil ikki hava útnyttað. Royndir eru gjørdar við at eksportera livandi goggur og niðurfrysta goggukjøt, eins og royndartrolað hevur verið eftir øðrum, t.d. vørpuskel, øðu o.s.fr.

## Ídnaður

Flakavirkir og fiskavirkir annars er onnur síðan av føroysku fiskivinnuni. Endurgjaldið frá tí almenna fer til virkir og skip undir einum.

Mett verður, at verandi flakavirkir hava nóg stóra orku til at framleiða burtur úr tí rávøru, sum kann fáast.

Ætlanin er at fáa gongd í útbyggingina av virkjum, sum kunnu víðarigóðska vøruna út yvir vanliga flakaframleiðslu.

Meðan framleiðsluorkan burturúr svartkjafti er um at vera munandi økt umborð í skipi, við keypinum av m/tr. Reynsatingi, gongur seinri uppi á landi. Bakkafrost er nakað útbygt.

Aftaná drúgvar samráðingar fekst semja í samgonguni um at játta útbygging av verandi flakavirki í Vestmanna til framleiðslu úr svartkjafti. Landsstýrið hevur útvegað sær løgtingsheimild til at fíggja 50% av íløguni. Menningargrunnurin hevur játtað at luttikið í fíggingini. Fíggingarmynstrið var frá landsstýrinum lagt soleiðis til rættis, at Ídnaðargrunnurin eisini skuldi luttaka við nøkrum fáum prosentum.

Hóast umsókn frá nevnda virki og hóast áheitan frá landsstýrinum, hevur Ídnaðargrunnurin avvíst at luttikið í hesi útbygging. Landsstýrið ætlar at finna aðrar útvegir.

Annars eru umsóknir um bygging av nýggjum stórum svartkjaftavirkjum á landi. Tá landsstýrið ikki metir, at figgjarstovnarnir eru til reiðar at fíggja tílík tiltøk enn, hetta er váttað frá ávísum stovnum, so hevur landsstýrið ikki avgreitt hesar umsóknir enn.

Líka so skjótt fígging fæst eftir vanligum reglum fer landsstýrið at stuðla bygging av tílíkum virkjum. Nýtt virki til turking av svartkjaftafarsi verður bygt á Toftum.

Í næstum er ætlanin at leggja fyri løgtingið uppskot um flutningsstuðul til tey flakavirkini, sum orsakað av fjarstøðu hava serliga høgar flutningsútreiðslur í samband við avskipan av lidnum vørum.

Sum nakað nýtt eru í summar gjørdar royndir at fremleiða fars úr

gulllaksi. Framleiðslutólini, sum tað almenna hevur goldið, eru sett upp hjá P/f Fisk í Hvalba. Framleiðslan er vælegnað til víðari góðsking og marknaðarútlitið fyri hesa vøru sýnist gott.

Ídnaðarvirkir í vanligum týdningi eru og verða framvegis stovnsett.

Ídnaðargrunnurin hevur í farna ári játtað 67 lán uppá 55,5 milj. kr. ímóti 37 lánum uppá 14 milj. kr. árið fyri.

Menningargrunnurin hevur seinasta ár játtað til 124 ymisk tiltøk 54,6 milj. kr., eisini nógv meira enn árið fyri.

Sum nevnt undir tollmálum er enn ikki komið á mál við einari smidligari skipan viðvíkjandi endurgjaldi av tolli til ídnaðin.

Í fjør vórðu reglurnar um stuðulslán til skipabygging í Føroyum broyttar munandi. Síðan tá eru gjørdir sáttmálar um bygging av fleiri skipum í Føroyum, tveir trolarar í Tórshavn, 1 minni trolari í Vági, 1 trolari og 1 frystifarmaskip á Skála, og talan er um aðrar sáttmálar afturat.

Í vár samtykti løgtingið kreppuhjálp til Skála Skipasmiðju uppá falt 15 mill. kr. Landsstýrið skeyt eftir avtalu við skipasmiðjuna upp, at partaeigararnir skulu veðhalda fyri teimum 15 milj. kr. Ein samdgongufloKkur broytti saman við andstøðuni lógaruppskotið í Figgjarnevndini soleiðis, at landskassin einsamallur kom at hanga uppá tey 75% av teimum 15 milj. kr. Onnur virkir hava longu boðað frá umsókn um tilsvarandi stuður.

## Skráseting av virkismøguleikum

Landsstýrið hevur samtykt at lata gera eitt yvirlit yvir føroyska lóggávu og aðrar reglur, ið eru galdandi fyri vinnuligt virksemi í Føroyum. Roknað verður við at hetta fer at lætta um møguleikarnar at seta virkir á stovn í Føroyum. Eisini kann eitt slíkt yvirlit vera ein hjálp til at finna fram til hvar, ið vinnulívslóggáva okkara treingir til ábøtur.

## Fiskaaling

Higartil eru givin 24 loyvi til aling av sílum og laksi, 5 loyvi til smoltstøðir og 7 til royndir við kræklingaaling.

Samlaða talið av flotbrúm ella -ringum, sum loyvi higartil er givið til, er 295, og samlaða framleiðsluorkan í hesum flótbrúm er umleið 1.500 tons um árið.

Framleiðslan av alifiski var í 1982 umleið 370 tons (100 tons av laksi og 270 tons av sílum) og søluvirðið verður mett til slakar 16 milj. kr. Í 1983 verður mett, at útflutningurin verður umleið 430 tons (130

tons av laksi og 300 tons av sílum) og virðið einar 21 mill. kr. størsti parturin verður seldur sum feskur og ísaður fiskur og prísirnir liggja um 70 kr. fyri kg. fyri laksin og umleið 40 kr. fyri kg. fyri sílini. Smærri nøgdir veða útfluttar royktar og/ella vacuumpakkaðar.

Mett eftir tí tali av laksa- og sílasmolti, sum er sett út í 1982 og 1983, verður framleiðslan í 1984 góð 700 tons, (220 tons av laksi og 480 tons av sílum), og í 1985 eini 1.250 tons, (550 tons av laksi og 700 tons av av sílum). Um roknað verður við einum meðalprísi uppá 50,- kr. fyri kg., verður søluvirðið í 1985 einar 62 - 63 milj. kr.

Tað sær sostatt út til, at útbyggingin á hesum øki brátt fer at geva úrslit av álvara.

## Farmasigling

Verandi samgonga setti sær fyri at fáa meira gongd í útbyggingina av føroyska farmaskipaflotanum.

Fleiri skip eru bygd í Føroyum og enn fleiri eru og verða bygd á útlendskum skipasmiðjum.

Størri nýggj farmaskip, sum eru komin og koma, eru: 2 farmaskip Herborg og Karolina til Hans Paula Johannesen og fleiri, 2 kemikaliutangaskip Crest Island og Cape Island til p/f Global Chemical Tankers, 2 frystifarmaskip frá Skála Skipasmiðju Selfoss (Ólavur Gregersen) til p/r Drekan og Vestlandia til P/f Kenn. 1 kontainaraskip til P/f Faroe Trader og P/f Star letur byggja tvey farmaskip á Skála og endaliga er sáttmáli gjørdur við Skála Skipasmiðju um at gera eitt farmaskip til eitt reiðarí í Vágum.

Sum nevnt áður hava hesar íløgur økt munandi um skuldina úteftir, men vónandi verða skipini før fyri at gjalda sín part av skyldunum.

## Ferðamannavirksemi

Ferðafólkastreymurin økist í hvørjum, bæði úr Føroyum og til Føroya.

Landsstýrið hevur sett niður nevnd at kanna møguleikarnar fyri at skipa ferðamannaviðurskiftini í Føroyum soleiðis, at ferðafólkastreymurin til Føroya verður til størst møguligan fyrimun og minst møguligan ampa fyri føroyska samfelagið. Nevndin kemur heilt skjótt við einari frágreiðing til landsstýrið, sum vil viðgera hana við tí í hyggju at leggja neyðug lógaruppskot fyri løgtingið.

## Landbúnaðurin

Byggjan av nýggjari royndarstøð í Kollafirði er nú endaliga samtykt.

Arbeiði verður skjótt at byrja við vegagerð v.m.

Uppskot til nýggja jarðalóg um almennu jørðina fyriliggur nú, og fer landsstýrið at viðgera uppskotið eftir summarfrítíðina.

Til tess at økja um stráfóðurframleiðsluna, er ætlanin at koma við einum studningi í hesum liði.

## Strandferðslan

Í vár kom millumlandasiglingin upp á pláss. Eitt privat partafelag keypti eitt skip úr Svørîki fyri umleið 140 milj. kr. og fór undir hesa sigling.

Í november í fjør varð Teistin leigaður til innanoyggja sigling í Trinidad, og er hesin sáttmáliu framlongdur til august í ár. Leiguinntøkan liggur um 1,6 milj. pr. mánað og skuldi nettoinntøkan hjá Strandfaraskipum Landsins ligið um 1 milj. pr. mánaða. Hvussu útlitini til framhaldandi leigumáli í Trinidad eru, er óavklárað í løtuni.

Hallið hjá Strandferðsluni hevur seinastu árini ligið um 30 milj. um árið. Fyribilstølini fyri fíggjarár 82/83 vísa, at hallið helst kemur niður um 20 milj. kr. Partur av hesum er inntøka frá Teistanum, sum varð leigaður til Trinidad í 5 mánaðir seinasta fíggjarár.

Nú millumlandasiglingin er løgd yvir í privat partafelag, er ætlanin at niðurleggja ferðamannadeildina á Strandferðsluni. Kanningar verða gjørdar um bygging/keyp av nýggjari fergu til innanoyggjasigling. Tørvur er á større ferju til vestmannasund. Siglingin inn á Skálafjørðin er heldur ikki í lagi fyrr enn vit fáa eitt skip afturat. Hertil kemur at tørvur verður á einari ferju til Skopunarfjørð. Fisini verður arbeitt við at leggja lastbilkoyringina hjá Strandferðsluni yvir á privatar hendur.

## Bussruturnar

Í vár varð samtykt at fara undir fyribils rutukoyring í Suðuroy. Væntandi kann hendan rutukoyring verða sett í verk í heyst.

Eisini verður umhugsað at seta í verk rutukoyring norður í Sundalagið og Norður-Eysturoy og í Norðoyggjum.

## Helikoptaraflúgving

Løgtingið samtykti í summar lóg um keyp av helikoptara.

Landsstýrið hevur síðan arbeitt við málinum og hevur samtykt at taka av tilboði frá Mærsk Air um at leasa ein Bell 212 (sama slag sum Tyrla) við keypsrætti til avtalaðan prís. Hetta hevði eftir Landsstýrisins meting verið tann biligasta loysnin og tann skjótasta loysnin. Vit kunnu við eini slíkari skipan inngangа samarbeiði við Mærsk Air um back-up kapaciteti, reservalutir og nýta teirra manning í eini innkoyringartíð. Hendan loysnin kundi verið framd soleiðis, at helikoptarin kemur upp at flúgva til heystar. Málið er nú til viðgerðar í fíggjarnevndini.

## Vegir og havnir

Í inniverandi fíggjarári verður stórt sæð arbeitt við nýgerð av vegum á sonu økjum sum seinasta ár.

Ein bygd hevur fingið vegasamband, og er tað Syðradalur á Streymoynni.

Bergholsgerðin til Lorvíkar gongur eftir ætlan, og arbeiðið norður á Trøllanes er byrjað av nýggjum.

Arbeiðið í Harladssundi byrjar eftir summarfrítíðina. 1 milj. kr. er játað.

Innan havnagerðir verður framvegis arbeitt eftir havnaætlanini, spurningurin um stuðulin frá ríkinum er avgreiddur.

Kanningar verða í løtuni gjørdar út fyri Kirkjubø til tess at kanna, hvar nýggj ferjulega best kann byggjast. Sjálvt arbeiðið ætlast byrja til várs.

## Orkumál

Landsstýrið góðkendi seinasta ár, at SEV fer undir ein part av vatnmegiútbyggingini í Eysturoynni og tekur neyðug lán til hesa útbygging. Góðkenningin var treytað av, at neyðug loyvi vórðu givin, m.a. frá friðingarmyndugleikunum.

Yvirfriðingarnevndin hevur hevt a Vandkvalitetsinstituttet í Hørsholm um at gera kanningar av teimum umhvørvisligu ávirkanum av at gera orkuverk á Eiði. Kanningarnar skulu verða grundarlag undir støðutakanini hjá yvirfriðingarnevndini til tað projektuppskotið, ið SEV hevur lagt fram.

Kanningarnar verða lidnar í oktober, og avgerðin hjá yvirfriðingarnevndini kann væntast skjótt aftaná.

Mátingartól eru sett á vindmylluna í Vágum, og mátingarnar fara at halda fram til næsta summar, tá verða so væntandi hollar royndir fing-

nar, at farið kann verða undir framleiðslu av vindmyllum.

Orkuráðið arbeiðir við at gera eina reglugerð og eina leiðbeining fyri bjálving av sethúsum.

Vatnmátingar verða gjørdar á 5 plássum í Vágum, á Streymoynni og í Eysturoy til tess at fáa so haldgott grundarlag fyri vatnmegiútbyggingini sum gjørligt.

Í 1981 fór orkuráðið undir eitt samarbeiðsprojekt við Nordforsk, ið umfatað 21 ymisk projekt býtt millum Noreg, Danmark, Ísland og Føroyar. Projektið verður undir einum nevnt Oliefisk. Føroyski parturin fevnur um kanning av orkunýtslu við partroling mótvegis einbátstroling. Komið er nakað áleiðis við arbeiðinum, og onkur partúrslit eru komin fram, men enn er ov tíðliga at fáa eina niðurstøðu út frá úrslitinum.

## Kommunumál

Uppskot til broytingar av kommunulógini, sum landsstýrið legði fyri tingið í vár, fall.

Sama nevnd, sum evnaði til uppskot um broyting av kommunulógini, er nú farin undir at gera uppskot til broyting av kommunuvallógini. Uppskotið skal verða liðugt at leggja fyri tingið í hesi tingsetu, kommunuval verður sum kunnugt á heysti 1984.

Úr kommunala lánigrunninum vóru seinasta fíggjarár játtaðar 6 milj. kr. til 13 kommunur, sum søktu. Í ár vóru, áðrenn freistin var úti 1. mai, einans komnar 3 umsóknir um lán úr grunninum. Tá áður nevndu 6 milj. kr. eru tiknar frá, eru til taks í grunninum 4,8 milj. kr., umframt eina lániheimild uppá 4 milj. kr.

Ríkisstudningurin til 6-ára havnaætlanina bleiv bert uppá 10%, at gjalda yvir fleiri fíggjarár. Hetta drag í havnastudninginum hevur tyngt um fíggjarviðurskiftini hjá fleiri kommunum og summar teirra hava verið noyddar at taka upp lán fyri tann frestandi studningin. Semja er nú fingin um, at landskassin ber tey 15%, sum restaðu í ríkisstudninginum, og fyribils leggur út ein part av ríkisstudninginum. Hetta tyngir um likviditetin hjá landskassanum.

Í sambandi við viðgerðina av IRF-málinum samtykti tingið, at renovatiónsspurningurin í Føroyum skal loysast við brenning av øllum brennbarum burturkasti í tíðarhóskandi brennistøð og álegði landsstýrinum at fáa spurningin um bygging av ruskbrennistøð loystan beinan vegin. Landsstýrið hevur ikki tikið nakra støðu í málinum, men fyndur hevur verið við IRF. Kannað verður nú, um møguligt er at finna annað byggilendi í Nes kommunu.

## Postverkið

hevði í 1982/83 eitt roknskaparligt hall uppá 5,9 milj. kr. Sjálvt um posttakstirnir hækkaðu 1. apríl í ár, verður roknað við einum halli uppá umleið 3 milj. kr. í 1983.

Nýtt posthús er tikið í nýtslu í Vági, og arbeitt verður við ætlanum um nýggj høli í Tórshavn og á Tvøroyri.

## Telefonverkið

Telefonnetið er nú fult útbygt, so tørvur bert er á íløgum í samband við vøkstur í felagatalinum.

Nýggj teknisk framstig innan telesamband fara tó helst at krevja munandi nýfløgur um nøkur ár til tess at halda okkum á hædd við grannalondini á hesum fyri samfelagsmenningina so týdningarmikla øki.

Tann stóra telefonverksútbygging, ið framd er, er fíggjað at kalla uttan eginpening, men mest við uttanlandslánum, ið hava givið kurstap, ið ikki hevur verið lagt upp fyri í ásetingini av telefongjøldum.

Telefonverkið hevur júst nú tikið upp lán uppá 8 mió. US$, fyrst og fremst til at afturgjalda eldri lán við.

Tann taksthækking, ið landsstýrið hevur mett neyðuga til tess at steðga afturgongdini í fíggjarstøðu telefonverksins, er ikki framd enn, við tað at løgtingsins fíggjarnevnd legði treytir við, sum ikki eru so einfaldar hjá landsstýrinum at lúka.

## Skúlamál

Landsstýri legði í mars í fjør fyri tingið uppskot til lóg um frítíðarundirvísing v.m. Skúlanevndin avgreiddi ikki málið í tí tingsetuni, men varð eftir umbøn gjørd til millumtinganevnd. Eftir at m.o. Kommunufelagið hevur havt høvið at úttala seg, varð lógin við smávegis umskipanum samtykt at koma í gildi 1. august í ár.

Tingið hevur eisini samtykt lóg um grundútbúgving innan fyrissitingar-, handils- og skrivstovuøki. Undirvísing eftir hesi skipan byrjar á nýggja handilsskúlanum í Havn, ið verður liðugur at taka í nýtslu aftan á summarfrítíðina.

Samráðingar er við ríkisstjórnina um bygging av vinnuskúlum. Talan er um maskinmeistaraskúla í Havn, handilsskúla á Kambsdali og 2. byggistig av teknisku skúlunum í Klaksvík og í Havn.

Í fjør vórðu ábøtur gjørdar á skipara- og heimaskiparalæruna og

landsstýrið arbeiðir víðari við at bøta um nautisku útbugvingina á Føroya sjómansskúla. Í komandi tingsetu fer landsstýrið at leggja fyri tingið uppskot til nýggja lóg um sjómansskúla og sjómanslæru, eins og reglugerðir verða gjørdar fyri læruna, prógtøkurnar og prógtøkuhaldið.

Ólavur Halgi er nú umbygdur og útgjørdur til eisini at virka sum venjingarskip hjæa skipara-, stýrimanna- og skipsføraranæmingum frá sjómansskúlanum.

Landsstýrið kannar møguleikarnar fyri at seta siglingarskúla á stovn her á landi.

Tann nevndin, ið sett varð at kanna og koma við uppskoti um, hvussu fiskivinnuútbúgvingin á besta hátt kann skipast, er nú komin so mikið langt í sínum arbeiði, at álit kann verða lagt fram í heyst.

Løgtingið hevur samtykt lóg um bústaðarhús til fólk í útbúgving.

Ein royndarskipan við einum Lista- og Handverkaraskúla hevur seinastu 4 árini virkað Heima á Sandi. Royndartíðin er nú komið at enda, og farið er undir at kanna og gera ætlanir um, hvussu og hvar skúlin møguliga skal halda fram. Komandi skúlaár er ætlanin at nýta skúlans lærarakreftir og útgerð til skeiðvirksemi fyri lærarar í fólkaskúlanum og í kvøldskúlunum.

## Heilsumál

Á heilsumálsøkinum eru, sum á øðrum økjum, hendar munandi broytingar. Heilsu- og heimasjúkrasystraskipanin er sett í verk frá 1. januar 1983. Heimasjúkrarøkt er sett á stovn um alt landið; heilsusystrar vanta enn í summun økjum, tí ikki er nóg mikið av útbúnum fólki.

Ljósmøðraskipanin í Føroyum er umskipað frá 1. mei 1983. Aðalmálið hevur verið at umleggja skipanina, so hon hóskar betur til tey broyttu viðurskiftini, har nærum allir barnsburðar fara fram á sjúkrahúsum í mun til fyrr, tá kvinnur áttu heima.

Á tannrøktarøkinum er skúlatannlæknaskipanin nú broytt soleiðis, at kommunurnar hava skyldu at veita børnum í undirvísingarskyldugum aldri ókeypis tannrøkt. Tannlækni er játtaður til búfólkið á Eiragarði, skúlanum á Trøðni og psykiatrisku deild á landssjúkrahúsinum vegna serligu umstøðurnar hjá hesum fólki, sum gera, at tey ikki kunnu viðgerast hjá vanligu tannlæknunum.

Skúlalæknaskipanin er endurskoðað soleiðis, at lækniakanningar

Løgtingstíðindi 1983

verða gjørdar av børnunum til og við 9. flokk, og í serstøkum førum til og við 10. flokk. Læknakanningarnar umfata nú eisini framhaldsdeildina.

Álitini um sjúkrahúsverkið hava verið til umrøðu í løgtinginum, og er málið nú til viðgerðar í serligu løgtingsnevndini um útbygging av sjúkrahúsverkinum.

Nevndin, sum sett varð at viðgera uppskot til tubbakslóg, hevur lagt fram álit, sum nú verður viðgjørt av landsstýrinum.

Ætlanir eru um at seta í verk fyribyrgjandi kanningar ímóti lívmóðurhálskrabbameini. Miðað verður ímóti, at hesar kanningar kunnu byrja í heyst.

## Almannamál

Endamálið hjá landsstýrinum er at hava eina sosiala skipan, ið er hóskandi til okkara viðurskifti, og sum er í hædd við ta, ið er galdandi í hinum Norðanlondum.

Landsstýri samtykti einmælt 8. september í fjør at leggja fyri tingið løgtingsmál um broyting í forsorgarlógini og barnaforsorgarlógini.

Á landsstýrisfundi 16. september samtykti ein meiriluti at taka málið aftur úr løgtinginum, har tað varð lagt fram 9. september. Málið varð sama dag av løgtingsformanninum tikið úr tinginum og sent landsstýrinum.

Landsstýrið legði 11. mars í ár málið aftur fyri tingið, har tað síðani varð samtykt við teirri broyting, at veitingarnar til teirra, sum koma í trongstøðu vegna tvørrandi arbeiðsmøguleikar, vórðu eitt sindur skerdar. Samtykta forsorgarlógin hevur stórt sæð sama innihald sum upprunaliga skotið upp.

Lógin um breinnistudning til ávísar pensionistar og stakar uppihaldarar er framlongd óbroytt í eitt ár.

Leiðarin fyri endurbúgvingarstovnin er settur, og høli til stovnin eru fingin til vega.

Ein arbeiðsbólkur er settur at kanna og koma við uppskoti um [illegible]

[illegible]

[illegible] liðug at taka í nýtslu fyrst í komandi ári.

Ein nevnd verður í næstum sett at skipa fyri bygging av roktar heimi í Suðurstreymoy.

## Flogferðsla

Landsstýrið hevur sum nevnt viðtikið at leiga helikoptara, og er málið til viðgerðar í figgjarnevndini.

Arbeitt verður við málinum um trygdarútgerð v.m. á tyrlupallunum kring landið.

Trygdareftirlitið í floghavnini er komið í fasta legu. Viðvíkjandi spurningunum um loftferðslulógirnar verður at bíðað eftir svari frá donsku myndugleikunum.

## Undirgrundarmálið

Verandi samgonga setti sær fyri at taka uppsamráðingar við donsku ríkisstjórnina um yvirtøku av undirgrund og havbotni.

Aftaná fleiri samráðingarumfør millum føroysku samráðingarnevndina (Jógvan Sundstein, Hilmar Kass og meg sjálvan) og ríkismálaráðið, sendi landsstýrið um ríkisumboðið eitt føroyskt uppskot til kommisorium hjá serligari »undirgrundarnevnd«.

Undir vitjan síni í Føroyum í byrjanini av hesum mánaðinum segði danski ríkismálaráðharrin landsstýrinum frá teirra uppskoti til kommisorium, sum seinni er sent landsstýrinum.

Danska uppskotið, sum landsstýrið hevur sent føroysku samráðingarnevndini til viðgerðar, hevur nærum sama innihald sum tað føroyska uppskotið.

Annars kann verða nevnt, at menn hava staðfest gassrák úr boriholini í Lopra. Hin jarðfrøðiligi týdningurin av hesum er, at nú er fingin ein fyrsta hóming um at livrunnið legugrót av onkrum slag helst er til, ikki so ógvuliga langt undir basaltháslættanum, uttan at tað kann sigast stórt meira um tað enn. Hetta eggjar til framhaldandi rannsóknir.

Leggjast kann afturat, at hetta eisini eggjar til at finna eina loysn á undirgrundarspurningunum sum skjótast. Annars kunnu tær samtyktir sum Føroya Løgting hevur gjørt um undirgrundina forða fyri, at røttu rannsóknirnar av undirgrundini kunnu fremjast nóg skjótt. At lata vera við at gera rannsóknir, alt meðan okkara grannar gera teirra rannsóknir nærri og nærri okkara øki, kann koma okkum aftur um brekku.

## Mentamál

Fyrireikingar til stovnsetan av almenna sjónvarpinum eru nú komnar

so langt, at sigast kann við vissu, at farið kann verða undir regluligar sendingar 1. januar komandi ár. Hóskandi hús eru fingin til vega, tvey starvsfólk eru sett og tað triðja verður sett í næstum, og útgerðin er boðin út.

Kanningar hava víst, at gamla loranstøðin er væl nýtilig sum sendistøð fyri Útvarp Froya. Eitt nýggj stød er metti at kosta millum 7,5 og 10 milj. kr. alt eftir hvat útgerð verður vald, so tann peningaupphædd, sum á løgtingsins fíggjarlóg er sett av til hetta endamál, er ikki nóg mikil til at arbeiðið kann byrja í hesum fíggjarári.

Tað musikkpædagogiska royndartiltakið við professionellum lærarakreftum hevur nú virkað í tvey ár og er farið at geva úrslit.

Arbeiðið við at umvæla Listaskálan er liðugt, og stendur skálin nú sum ein prýðilig ramma um okkara myndalist.

Norðurlandahúsið er nú farið undir vanligt virksemi. Byggingin, sum í okkara part hevur kostað um 10 milj. kr., hevur tyngt um mentunarkontoina á fíggjarløgtingslógini seinnu árini. Hereftir verður bert talan um rakstur, sum í okkara part verður 8% av samlaðu útreiðslunum.

Umhugsað verður at nýta gomlu royndarstøðina í Hoyvík partvíst sum útisavn og peningur til hetta endamál er tøkur í grunni. Nevnd sett av landsstýrinum er júst komin við uppskoti um framtíðarnýtslu av royndarstøðini í Hoyvík og av Hoyvíksgarði.

## Javnstøðismál

Landsstýrið hevur biðið serligu javnstøðisnevndina gjørt uppskot til løgtingslóg við tí fyri eyga at tryggja javnrættindi millum kvinnur og menn.

## Ferðaútreiðslur

Ein av teimum spurningum, sum serliga vórðu viðgjørdir í sambandi við umrøðuna á løgtingi av løgmannsrøðuni fyri 1982 og í bløðunum, var støddin av ferðaútreiðslum løgmanns uttanlands. Tær nevndu upphæddirnar vóru ymiskar í stødd, heilt upp til fleiri milj. kr. í ferðaútreiðslum hjá løgmanni sjálvum.

Tá ábreiðslurnar fyrst og fremst frá andstøðuni, men eisini frá ávísum samgongumonnum, vóru so álvarsligar, kendi eg meg noyddan til at umbera, at støddin av mínum ferðakostnaði uttanlands ikki varð upplýst í løgmannsrøðuni. Hinvegin gav eg lyfti um at greiða nærri frá hesum nú í ár. Samlaði ferðakostnaðurin hjá tí almenna er fyri sein-

asta árið umleið kr. 2.700.000.

Út frá teimum upplýsingum, sum eg havi fingið frá Føroya Gjaldstovu, hava løgmaður og teir 5 landsstýrismennirnir ferðast fyri umleið kr. 300.000 tað seinasta árið, t.v.s. frá seinastu Ólavsøku til í dag. Av hesum kr. 300.000 havi eg eftir øllum at døma brúkt knappan triðjungin ella út móti kr. 100.000.

Í og fyri seg haldi eg hetta vera eitt sera talandi og »typiskt« dømi um tað hald, sum hevur verið í teimum atfinningum, sum higartil eru komnar frá verandi andstøðu.

Hinvegin eru samlaði útreiðslurnar til uttanlandsferðir vaksandi. tað sýnist sum teir ymisku teknisku og umsitingarligu stovnarnir fáa ein alt større tørv fyri uttanlandsferðum, fyrst og fremst til útbúgving- og kanningarendamál.

Landsstýrið fer at royna at avmarka hesar útreiðslur.

---

## Samantak

Framman fyri eru gjørdar nakrar viðmerkingar til gongd og støðu á nøkrum av teimum mest týdningarmiklu samfelagsøkjunum. Skal ein taka saman um, má sigast, at virksemið í landinum sum heild framvegis liggur á einum høgum støði. Nógv positiv úrslit eru, sum víst kundi verið á. Nógv er at fegnast um. Hin vegin er eisini orsøk at steðga á og viðurkenna, at okkurt kundi verið komið longur áleiðis. Okkurt kundi verið betur úr hondum greitt. Soleiðis vil tað altíð vera.

Størsti spurningurin fyri land okkara hevur seinastu 6 - 8 árini verið fíggjaliga gongdin og støðan. Hetta er framvegis tann týdningarmesti samfelagsspurningurin. Líta vit at inntøkusíðuni hjá okkara samfelag, t.e. útflutningurin og statsstuðulin, so er framvegis talan um munandi vøkstur.

Útflutningurin hækkaði frá 1981 til 1982 við 60 milj. kr. til ialt 1.246 milj. kr. Útflutningurin fyri fyrsta hálvár í 1983 er umleið 19% størri enn í sama tíðarskeiði 1982. Roknast kann við einum vøkstri fyri árið 1983 uppá umleið 9% ella umleið 109 milj. kr. ella einum samlaðum útflutningi í 1983 uppá umleið 1.355 milj. kr. Orsøkin er fyrst og fremst, at tað í 1981 eydnaðist sitandi landsstýri at steðga tí óhugnaligu niðurgongd, sum fór fram í árinum upp til og við 1980, í okkara

rættindum at fiska í frenmandum sjógvi, ístaðin er gongdin hesi seinastu trý árini, at avtalurnar samanumtikið eru vorðnar betri og betri ár um ár. Hertil kemur, at fiskiskapurin í okkara egna sjógvi hevur verið góður, serliga nú í vár.

---

Tíverri er tað ikki bert á inntøkusíðuni, at talan hevur verið um vøkstur. vøkstur.

Innflutningurin er eisini øktur og tað í stórum. Í árinum 1/4 - 1982 til 31/3 - 1983 er innflutningurin økur við 27,1% í mun til sama tíðarskeið árið fyri ella við 416 milj. kr. Meginparturin av hesum vøkstri fellur á vørur til vinnulig endamál, bæði íløgur og rakstur, og til sethúsa- og annleggsbygging. Vøksturin í innflutningi av vørum til beinleiðis nýtslu er tó bert 44 milj. kr. ella 10,9% í krónuvirði. Í nøgd er talan um beinleiðis minking. Hetta vísir deils, at tiltøkini sum landsstýrið hevur sett í verk til avmarking av nýtsluni hava munað og deils at vit framleiða alt meira av okkara vørum heima á landi.

Tann útreiðsluupphæddin, sum gevur størstu orsøkina til álvarsemi og iva, er rentur og kurstap uppá uttanlandsskuld. Vit vóru nakrir, sum ávaraðu táverandi leiðslu landsins ímóti at økja so skjótt og so munandi um okkara uttanlandsskuld við lánum sum fyrst og fremst vórðu nýtt til nýtslu og produktivar íløgur. Vit vístu á, at ein við at læna til tílík endamál skjótt og lætt kundi koma í ta støðu, at tað bleiv torført at gjalda rentur og avdráttir uppá tílíka skuld, júst tí at framleiðslan ikki hækkaði tilsvarandi.

Hyggja vit eftir tølunum fyri 1981 og 1982 so eru hesi ein ítøkilig váttan av, at vit tíverri fingu ræt í okkara spádómi. Hesi bæði árini, 1981 og 1982, vaks nettouttanlandsskuld føroyinga við 520 mili. kr. Hvat hesin peningur bleiv nýttur til? Til rentur og kurstap uppá gamla uttanladsskuld. Í 1981 og 1982 læntu vit so at siga einki uttanlands til nýtslu og íløgur. Tær megnaðu vit sjálvir. Men álíkavæl vaks uttanlandsskuldin við 490 milj. kr. hesi bæði árini, og tað gjørdi hon heilt »automatiskt«, við nevndu rentum og kurstapi uppá uttanlandsskuld sum longu var upptikin. Og gongdin er enn tann [illegible] uma.

Setningurin hjá summum av verandi samgongulimunum var at broyta gongdina rætta vegin. Eingin gav lyfti um, og eingin tríði uppa at gera okkum skuldafríar eftir fáum árum. Gongdin skuldi broytast deils við einum framtakshugaðum politikki, sum økti um inntøkur

samfelagsins. Hetta hevur eydnast í størri mun enn í hvussu so er eg sjálvur hevði roknað við. Men tað skuldi eisini gerast við at fáa tamarhald á tær almennu óproduktivu íløgurnar og harav fylgjandi rakstrarútreiðslurnar. Hetta hevur ikki eydnast.

Úrslitið hevur sum sagt verið, at vit ikki hava megnað at goldið rentur og kurstap uppá okkara uttanlandsskuld fyri ikki at tala um avdráttir.

Kann vera at onkur heldur, at hetta verður borið fram við tí fyri eyga at tváa hendur og kasta ábyrgdina yvir á aðrar. Soleiðis skal tað á ongan hátt skiljast.

Saman við mínum partamonnum taki eg fulla ábyrgd av tí, sum higartil er farið fram. Eg vil enntá sjálvur taka høvuðsábyrgdina.

Vit hava sett fram okkara krøv, og fingið summi av teimum uppfylt. Vit hava eisini slakað yvir fyri krøvum frá øðrum, kanska ov nógv í summum førum.

Vit hava slakað so nógv út frá tí veruleika, at ein meiriluti á løgtingi í dag gongur inn fyri einum øðrum fíggjarpolitikki, enn vit sjálvir gera.

Eftir mínum tykki hevði ein og hvør onnur samansetting av samgongu úr verandi løgtingi givið eins vánaligan fíggjarpolitikk sum tann, ið rikin er, helst verri.

Nevnast kann at broytingaruppskotini frá andstøðumi til fíggjarløgtingslógina ikki høvdu bøtt um fíggjarvánirnar, beint tvørturímóti.

Tá eg nú nevndi andstøðuna, so kann eg leggja afturat, at vit framvegis ikki hava fingið nakað veruligt tjak millum andstøðu og samgongu. Hetta er politiskt ósunt. Væl hevur andstøðan í ávísum førum roynt at gjørt nógv burtur úr ávísum málum; hetta er serliga galdandi fyri størsta andstøðuflokkin og floksblað hansara.

Tey allar flestu av hesum »sensatiónsmálum« eru tó brostin sum sápubløðrur, áðrenn tey fangaðu.

Tó havi eg varhugan av, at tað í tveimum førum hevur eydnast andstøðuni í teirra atfinningum at fanga áhuga.

Anna málið er persónligu ferðaútreiðslur løgmans. Teimum havi eg greitt frá frammanfyri. Hitt málið er spurningurin um netto uttanlandsskul. Og her hevur andstøðan so mikið av grein í sínum máli, at tað eisini her varð neyðugt at greiða frá. Tá teir báðir núverandi stórar fløgur í fyrst og fremst farmaskip og eisini onnur skip, 370 milj. kr. og at vit ikki hava megnað at gjalda rentur og kurstap av uttanlandsskuld uppá 675 milj. kr. Hetta svarar eisini til vøksturin uppá umleið

1.050 milj. kr. hesi 3 árini. Sitandi samgonga hevur uppiborið atfinningar á hesum øki. At teir báðir stóru andstøðuflokkarnir ikki eru teir røttu at koma við hesum atfinningum, er ein onnur søga. Men vit áttu at havt rikið ein meira ábyrgdakendan fíggjarpolitikk, enn vit hava gjørt.

Til samgongu menn mínar vil eg siga at enda:

Tað er heilt týðuligt, at vit hava broytt gongdina til tað betra, bert ikki nóg mikið.

Ígrundini hevur tað ikki gingið so heilt av leið hesi skjótt trý árini. Hetta er sjálvandi ikki bert okkum sjálvum fyri at takka.

Tað hevur eydnast at steðga niðurgongdini í okkara fiskiaettindum í fremmandum sjógvi, í hvussu er inntil nú.

Okkara egnu grunnar hava givið nógv av sær, serliga í ár.

Samanum tikið hava søluprísirnir lagað seg heilt væl.

Vit hava við øðrum orðum verið fyri stórum inntøkuvøkstri.

Á útreiðslu fóum og ídnaðarfóum hava vit fingið nógv at skalla, í summum førum ov nógv.

Vit hava stovnsett nógv nýggj arbeiðspláss, og hevur tað stórt sæð eydnast at umgingið arbeiðsloysi í Føroyum í eini tíð, tá okkara grannalond hava stórar trupulleikar á hesum øki.

Vit hava verið ósamdir. Vit hava enntá havt fleiri politiskar kreppur, allar stavandi frá ósemju um støddina av almennum útreiðslum.

Lat tað fara, kundi onkur sagt. Lat okkum hyggja fram eftir ístaðin. Og tí eri eg samdur í.

Men hyggja vit frameftir, so síggja vit beint inn í eitt valár. Og er tað nakað, sum eyðkennir eitt valár, so er tað eyka útreiðslur fyri tað almenna.

Lat tað verða sagt longu nú. Órímilig krøv til komandi fíggjarløgtingslóg verða ikki góðtikin. Játtanir út yvir fíggjarløgtingslógina, sum semja ikki er um innan samgonguna, verða slettis ikki góðtiknar.

Tað skal vera mín vón, at vit í komandi valári kunnu semjast um ein politikk, sum liggur innan fyri samgonguavtaluna og aðrar gjørdar politiskar avtalur.

Hetta merkir, at vit hava dirvi til at bøta enn meira og munandi meira um fíggjarligu gongdina í Føroyum.

Við hesum orðum ynski eg gott samstarv innan tinggátt, gott samstarv millum løgting og landsstýri og Harrans signing yvir Føroyar og fólkið, her býr.

# 1. Ymisk inntøkulógaruppskot

Ár 1983, leygardagin, 6. august legði Torbjørn Poulsen, landsstýrismaður fram soljóðandi

*Uppskot I: Broyting í innflutningsgjøldum.*
*Uppskot II: Broyting í serliga innflutningsgjaldinum.*
*Uppskot III: Broyting í eykainnflutningsgjaldinum.*

## I

## Uppskot
## til
## løgtingslóg um broytingar í innflutningsgjøldum

**§ 1.** Í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjøld v.m. við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. Nýtt punkt 2:
   *Blómur og pottaplantur.*
   2.01 Øll sløg av blómum og pottaplantum av virðinum 15%

2. Punkt 2 verður punkt 3: *Bustarvørur.*

3. Punkt 3 verður punkt 4: *Drykkjuvørur,*
   og verður broytt soleiðis:

| | |
|---|---|
| 4.02 Mousserandi vín (champagna) | í litur 20,00 kr. |
| 4.03 Borðvín (reyðvín og hvítvín) | í litur 11,50 kr. |
| 4.04 Annað vín | í litur 24,00 kr. |
| Av vørunum, sum nevndar eru í 4.05, 4.06 | |

| | |
|---|---|
| og 4.07 verður afturat framman fyri nevndu gjøldum rindað | av virðinum 30% |
| Spirituosa og spritt: | |
| Brennivín: | |
| 4.05 Undir 23 rúmprocent | 1 litur 24.00 kr. |
| 4.06 23 men ikki yvir 50 rúmprocent | 1 litur 75,00 kr. |
| 4.07 Yvir 50 men ikki 60 rúmprocent | 1 litur 90,00 kr. |

3.08 og 3.09 verða strikað.

| | |
|---|---|
| Av vørum sum nevndar eru í lp. nr. 4.05, 4,06 og 4.07 verður afturat framman fyri nevndu gjøldum rindað | 50% |

Viðm.: Likørur hoyrir undir 4.06.

3.11 verður 4.08
3.12 verður 4.09
3.13 verður 4.10

4. Punkt 4 verður punkt 5 og verður broytt soleiðis:
5.01 og 5.02 verða løgd saman til eitt punkt, 5.01, og skoytt verður uppí:
»og framkalling av filmum av virðinum 10%«

5. Pkt. 5 verður pkt. 6,
- 6 - - 7,
- 7 - - 8,
- 8 - - 9.

Í pkt. 9.02 verður aftaná »plátur« sett: »bond« og aftaná »og eykalutir til hesar« verður sett: »undantikin eru eykalutir til navigatiónstól, siglingar- og leitingartól og kommunikatiónsútgerð.«

Pkt. 8.03 verður 9.03,
- 8.04 - 9.04

Nýtt pkt. 9.05: Innspæld videobond til leigu hvørt bandið 400,00 kr.

Pkt. 9 verður pkt. 10
- 10 - - 11,
- 11 - - 12,
- 11.01 - - 12.01,
og verður broytt soleiðis:

12. *Lampur, ravmagnsinnleggingarlutir o.l.*
12.01 Lampur, ljósarmaturir, ljósperur v.m. Øll sløg av lampum, ljósperum, ljósevnisrørum og ljósskeltum við hesum undantøkum: Kvikksilvurperur, natriumperur, halogenperur, xenonperur, signalperur og glimperur, ljóskastarar, ferðslu-ljósperur, lummalyktir, dynamolyktir, boyulyktir, lanternur og morsiperur: ..... 30%

11.02 verður 12.02 og verður broytt soleiðis:

12.02 *Sterkstreymstilfar:*
Avbrótarar upp til 25 A, gruppuavbrótarar, automatiskir avbrótarar, rosettir, kontaktorar, motorvernd, releir, kontaktir, trappuautomatir, sikringar, sikringselement, patrónhøvd, monteringstilfar, stikkproppar og leingjaralið upp til 16 A, lidnir leingjaraleidningar, strúkijarnsleidningar o.l. ávaringarskelli o.l., stikkkontaktir, botnskrúur, samlimuffur, klemmur, kaðalskógvar og dósir v.m. við hesum undantøkum:
Loftleidningstilfar til há- og lágspenning, mastrar, isolatorar, kaðaltilfar, kaðalskáp, vatntøtt apparatskáp, sikringskassar, forgreiningskassar, málaraskáp, vegaljósskáp, stikkproppar, leingaralið yvir 16 A, bryggjukontaktir, connectors, eltalvur, elmálarar, kaðalskinnarar, kanalskinnarar, kontaktskinnarar, málararammur, tilfar til avbrót-

arar yvir 25A, termostatar, pressostatar o.l., háspenningartilfar og magnetventilar: ..... 30%

6. Punkt 12 verður strikað.

7. Í punkt 14.01 verður strikað:
»teknikol og teknikrit. Vanligir blýantar, litstiftir og tusch. Kalkerpapír og litbond.«

8. Pkt 16 verður broytt soleiðis:
Leik- og ítróttarlutir, leikutoy og felagsspæl:
16.01 Lystfør av ymiskum slagi, øll sløg av fimleikaraamboðum, styrkivenjisamboð, ítróttaramboð av ølum slag, heruppií mál, málstengur og net. Leikutoy og felagsspøl: . 20%

9. Í pkt. 18.01 fer »tó ikki« burtur úr og í staðin verður sett »eisini«.

10. Í pkt. 19.03 verður aftaná »stáli« innsett: »kopari og messing«.

11. Pkt 21.02 fellur burtur.

12. Pkt. 27:
*Knallertir, súklur og vognsmíðverk:*
Pkt. 27.01, 27.02, 27.03, 27.04, 27.05 og 27.06 fella burtur
27.07a verður 27.01a knallertir: ..... 55%
27.07b verður 27.01b súklur: ..... 25%
27.08, 27.09, 27.10 fella burtur
27.11 verður 27.02
27.12 fellur burtur.

13. § 1, stk. 2 verður strikað.
§ 1, stk. 3 verður stk. 2.

14. § 2, f: »antikvitetir« fellur burtur. Sum pkt. h verður sett: »antikvitetir«.

15. § 3, c verður orðað soleiðis:
c. fyri lutir, ið koma higar til umvælan, vask stutt brúk, til leigu o.t., og verða fluttir útaftur, eisini fyri lutir, sum í sama endamáli eru útfluttir og nú koma heim aftur til Føroya.

Í § 3 verður sett sum nýtt stk. j:
»Fyri egin listaverk, ið listamenn sjálvir innflyta, ella í førum har stovnur innflytir og sýnir fram ella selur listaverkini listamansins vegna og fyri hansara rokning, soleiðis at skilja at viðkomandi stovnur bert virkar sum millumlið.

16. § 5 verður orðað soleiðis:

»Tann gjaldskylduga nøgdin av eini vøru verður at rokna eftir faktura ella eftir, hvat innballingin vísir ella eftir teirri uppgávu fyri støddd, sum vanligt er í handilsviðurskiftum.
2. stk. Tað gjaldskylduga virðið av eini vøru er fakturaprísurin við frádrátti fyri møguligan avslátt, og uttan at lagt afturat er innflutningsgjald eftir hesi lóg, kostnaður fyri flutningsíløt, trygging og flutningsútreiðslur v.m. frá avskipingarhavn til Føroyar.
3. stk. Ikki verður við inklarering roknað við avslátti, uttan so at hesin er frádrigin sjálvum fakturanum. Framleiðsluútreiðslur, útreiðslur til avskipingarhavn verður ikki drigin frá gjaldskylduga virðinum, tá toll- og innflutningsgjøld verða roknað.
4. stk. Um tann veruliga nøgdin ella virðið av eini vøru ikki kann ásannast sbr. omanfyri, verur nøgd ella virði ásett av tollvaldinum.
5. stk. Umrokning frá fremmandum til føroyskan pening verður eftir peningsvirðinum tann dagin, tollgreiðslan fer fram.

17. Sum nýggj § 20 verður sett:
»§ 20. Tollvaldinum er frítt at fara á havnaøkjum og floghavnum og somulciðis at gera kanningar á pakkhúsum á havnaøkjum og í floghavnum. Eru har øki, ið eru innigyrd ella á annan hátt avstongd, hevur eigarin skyldu til at bera so í bandi, at tollvaldið fær frítt at fara um slík øki.«

§ 20 verður § 21,
§ 21 — § 22,
§ 22 — § 23,
§ 23 — § 24,
§ 24 — § 25,
§ 25 — § 26.

18. § 26 verður § 27 og verður orðað soljóðandi:
»Øll ferðandi hava skyldu at geva seg undir eftirlit hjá tollvaldinum. Persónar, sum koma til ella frá tollumráðnum, hava skyldu at geva seg undir eftirlit hjá tollvaldinum, uttan at tollvaldið hevur givið boð um hetta. Persónar, sum koma eru undir eftirlit hava skyldu til at geva tollvaldinum upplysing um navn, búðstað og føðidato. Ferðandi hava sjálboðin skyldu til at siga tollvaldinum frá øllum tí, tey hava í viðføri og somuleiðis at siga tollvaldinum frá øllum sjónligum sum loyniligum goymslum í tí, tey nýta at flyta ferðagóðs og vørur sínar í. Ferðandi hava sjálv skyldu til at lata upp og pakka ut vørur og ferðagóðs í tann mun, tollvaldið heldur tað vera neyðugt. Ferðafólk hava sjálv skyldu til at pakka niður aftur tað, ið tollvaldið hevur krav í til eftirlit.

19. Sum § 28 verður sett:
»§ 28. Persónar, sum verið hava umborð á skipi ella flogfari, mugu ikki taka við sær toll- ella gjaldskyldugar vørur, fyrr enn tær

eru givnar upp og eftirhugdar av tollvaldinum. Tollvaldinum er heimilað at gera kanningar av persónum, ið ferðast hava um tolløki, ella sum hava verið umborð á skipum ella flogførum. Somuleiðis hevur tollvaldið heimild at gera kanning av persónum, ið staddir eru á havnaøkinum, tá tollvaldið metir grundarlag vera fyri hesum.«

20. Sum § 29 verður sett:
»§ 29. Undir eftirliti av inn- og útflutningi av vøru v.m. hevur tollvaldið rætt at kanna persónar, sum koma og fara.
Stk. 2. tá ið tað eru ikki bert uttanáklæðini má eftirkanning av persóni bert gerast, tá ið nóg góðar grundir eru til at halda, at viðkomandi hevur uppi á sær okkurt ólógliga. Um rættindi hjá tollvaldinum at krevja sær atstøður frá politivaldinum, galda somu reglur sum fyri tolleftirlitið yvirhøvur.
Stk. 3. Eftirkanning av persóni má bert innast eftir boðum frá yvirtollmanni, sum er til staðar. Eftirkanningin skal fara fram so varliga sum gjørligt og ikki longur enn endamálið krevur tað.
Stk.4. Til eftirkanning av persóni krevst, at hann, sum kannar eftir ella er hjástaddur, skal vera av sama leggi sum hann, sum eftirkannaður er. Hann, sum kannaður verður, kann krevja sær vitni at vera hjá undir eftirkanningini.
Stk. 5. Tollvaldinum er heimilað at fylgja og steðga persónum og flutningsførum, ið hava sloppið sær undan eftirliti, og sum kunnu ætlast at hava við sær tollskyldugar vørur, ella vørur, ið bannaðar eru at innflyta. Í slíkum førum hevur tollvaldið rætt til at gera kanning í húsum og flutningsførum, tá hetta verður gjørt sum beinleiðis framhald av eftirlitinum.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi 1. november 1983.

I

**Forslag**
**til**
**lagtingslov om ændring i indførselsafgifter**

**§ 1.** I lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 om indførselsafgifter m.v. med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1. Nyt pkt. 2.:
*Blomster og potteplanter*

| | | |
|---|---|---|
| 2.01 Alle slags blomster og potteplanter .... | af værdien | 15% |

Pkt. 2 bliver pkt. 3: *børstevarer,*

3. Pkt. 3 bliver pkt. 4: *drikkevarer,*
og ændres således:

| | | |
|---|---|---|
| 4.02 Mousserende vin (champagne) | 1 liter | 20.00 kr. |
| 4.03 Bordvin (rødvin og hvidvin) | 1 liter | 11,50 kr. |
| 4.04 Anden vin | 1 liter | 24,00 kr. |

Af varerne, der er nævnt i lbnr. 4.01, 4.02, 4.03 og 4.04 skal der foruden de afgifter erlægges af værdien ..... 30%

Spirituosa og spiritus:
Brændevin:

| | | |
|---|---|---|
| 4.05 Under 23 rumprosent | 1 liter | 24,00 kr. |
| 4.06 23 men ikke over 50 rumprocent | 1 liter | 75,00 kr. |
| 4.07 Over 50, men ikke over 60 rumprocent | 1 liter | 90.00 kr. |

3.08 og 3.09 udgår.

Af varer, som er nævnt i lbnr. 4.05, 4.06 og 4.07 skal der foruden forannævnte afgifter erlægges af værdien af værdien 50%

Anmærkning: Likør henføres under lbnr. 4.06.

3.11 ændres til 4.08
3.12 - - 4.09
3.13 - - 4.10

4. Pkt. 4 bliver pkt. 5, og ændres således:
5.01 og 5.02 lægges sammen til samme punkt, 5.01, og der tilføjes »og fremkaldelse af films« af værdien 10%

5. Pkt. 5 bliver pkt. 6,
- 6 - - 6,
- 6 - - 7,
- 7 - - 8,
- 8 - - 9.

I pkt. 9.02 indsættes efter »plader«: »bånd« og efter »reservedele til disse« indsættes: »Undtaget er reservedele til navigations-, besejlings- og eftersøgnings- og kommunikationsudstyr.«

Pkt. 8.03 bliver pkt. 9.03,
- 8.04 - - 9.04.
Nyt pkt. 9.05 Indspillede videobånd til udlejning, pr. bånd 400,00 kr.

Pkt. 9 bliver pkt. 10,
- 10 - - 11,
- 11 - - 12,
11.01 bliver pkt. 12.01, og ændres således:

Pkt. 12 *lamper, elektriske installationsartikler m.m.*
12.01 *lamper, lysarmaturer, lyspærer m.v.*
Alle slags lamper, lyspærer, lysstofrør og neonrør med disse undtagelser: Kviksølvpærer, natriumpærer, halogenpærer, xenonpærer, signalpærer og glitterpærer, lyskastere, færdselslyskurver, lommelykter, dynamolykter, bøjelykter, lanterner og morsepærer ..... 30%

| | |
|---|---|
| Alle slags armaturer, lampekupler, skærme o.l. og alle slags el-installationsartikler med disse undtagelser:<br>Kviksølvsarmatur, natrium- og halogen-armatur, installationsrør og kabel, kabelbakker, skruer o.lign., transformatorer, ensrettere og strømforsyuere ..... | 30% |

11.02 bliver 12.02 og ændres således:

| | |
|---|---|
| 12.02 *Stærkstrømsartikler*<br>Afbrydere opp til 25 A, gruppeafbrytere, automatiske afbrydere, rosetter, kontaktorer, motorbeskyttere, relæer, kontakter, trappeautomater, sikringer, sikringselementer, patronhoveder, monteringsartikler, stikpropper og forlængelsesled op til 16 A, færdiggjorte forlængelsesledninger, strygejernsledninger o.lign., advarselsskilte o.lign., stikkontakter, bundskruer, samlemuffer, klemmer, kabelsko og dåser m.v. med disse undtagelser:<br>Luftledningsmateriale til høj- og lavspænding, mastisolatorer, kabelmateriale, kabelskabe, vandtætte apparaturskabe, sikringskasser, forgreningskasser, målerskabe, vejlysskabe, stikproppe og forlængerled ud over 16 A, kajkontakter, connectors, el-tavler, el-målere, kabelskinnere, kanalskinnere, kontaktskinnere, måleranmer, materiale til afbrydere over 25 A, termostater, pressostater o.l. højspændingsudrustning og magnetventiler .. | 30% |

6. Pkt 12 udgår.

7. I pkt. 14.01 udgår »tegnekul og tegnekridt. Almindelige blyanter og farvestifter, samt tusch, kalkerpapir og farvebånd.«

8. Pkt. 16 ændres således:
*Spil- og idrætsartikler, legetøj og fællesspil.*

16.01 Lystfartøjer af forskellige slags, alle slags gymnastikredskaber, kondi- og styrketræningsredskaber, idrætsredskaber af enhver art, herunder mål, målstænger og net, legetøj og fællesspil ..... 20%

9. I pkt. 18.01 udgår »dog ikke« og i stedet indsættes »også«.

10. I pkt. 19.03 indsættes efter »stål«: »kobber og messing«.

11.. Pkt. 21.02 udgår.

12. Pkt. 27 *Knallerter, cykler og vognmagerarbejde:*
Pkt. 27.01, 27.02, 27.03, 27.04, 27.05, 27.06 udgår.
27.07a ændres til 27.01a knallerter 55%
27.07b ændres til 27.01b cykler 25%
27.08, 27.09, 27.10 udgår.
27.11 ændres til 27.02.
27.12 udgår.

13. § 1, stk. 2 udgår.
§ 1, stk. 3 ændres til stk. 2.

14. § 2 f: »antikviteter« udgår.
som pkt. h indsættes: »antikviteter«.

15. § 3, pkt. c formuleres således:
c. Af sager, der indgår til reparation, vask, midlertidig anvendelse, til leje o. lign. og genudføres. ligesom af sager, der efter i samme øjemed at have været udført, kommer tilbage til Færøerne.
I § 3 indsættes som nyt stk. j: »for egne kunstværker, sum kunstnere selv importerer eller i tilfælde, hvor en institution importerer og udstiller eller sælger kunstværkerne på kunstnerens vegne og for hans regning, så-

ledes at forstå, at vedkommende institution kun har den funktion at være mellemled.

16. § 5 formuleres således:
»§ 5. En vares afgiftspligtige mængde vil kunne ansættes efter fakturaens eller emballagens udvisende eller efter den gængse handelsmæssige størrelsesangivelse.
*Stk. 2.* Den afgiftspligtige værdi af en vare er fakturaprisen med fradrag af mulig rabat, uden at der er tillagt indførselsafgift i henhold til denne lov, udgifter for emballager, forsikring og transportudgifter m.v. fra afskibningshavn til Færøerne.
*Stk. 3.* Ved inklarering regnes kun med rabat, såfremt denne er fratrukket selve fakturaen. Produktionsomkostninger, udgifter til emballage, indfrysning, skæring, mærkning, indpakning og lager, såvel sum transport og andre udgifter til afskibningshavn fratrækkes ikke den afgiftspligtige værdi, når told og indførselsafgifterne beregnes.
*Stk. 4.* Kan varens rigtige mængde eller verdi ikke godtgøres som forannævnt, fastsættes mængden eller værdien af den opkrævede myndighed.
*Stk. 5* Omregning fra fremmed til færøsk mønt sker efter kursen den dag, toldberigtigelse sker.

Som ny § 20 indsættes:

17. »§ 20. Toldmyndighederne har bemyndigelse til at færdes frit på havneområder, i lufthavne og tillige at foretage undersøgelser af pakhuse på havneområder og lufthavne. Er der talen om områder, der er indhegnede eller på anden måde aflåste, har ejeren pligt til at sørge for at toldmyndighederne har fri adgang til sådanne områder.«

§ 20 ændres til § 21,
§ 21 - - § 22,
§ 22 - - § 23,
§ 23 - - § 24,
§ 24 - - § 25,
§ 25 - - § 26.

18. § 26 bliver § 27 og formuleres således:
»§ 27. Alle rejsende har pligt til at lade sig underkaste kontrol af toldmyndighederne. Personer, der ankommer til eller fra toldområdet, har selvstændig pligt til at underkaste sig kontrol hos toldmyndighederne og uden at toldvæsnet har givet ordre herom. Personer, som ankommer til kontrol, har pligt til at meddele toldvæsnet oplysning om navn, bopæl, fødselsdato, rejsende har selvstændig pligt til at give toldvæsenet oplysninger om, hvad de har med som baggage og ligeledes at meddele toldvæsenet alle synlige og skjulte gemmer i det, de anvender til at transportere rejsegods og varer i. Rejsende har selv pligt til at åbne for og udpakke varer og rejsegods i det omfang, toldvæsnet skønner, dette er nødvendigt. Rejsende har selv pligt til at indpakke alt, hvad toldvæsenet har forlangt kontrolleret.«

19. Som § 28 indsættes:
»§ 28. Personer, der har været ombord i skibe eller fartøjer, må ikke ilandbringe told- og afgiftspligtige varer forinden disse er angivet for og efterset af toldvæsenet. Toldvæsenet har hjemel til at foretage undersøgelse af personer, der har passeret toldområdet eller som har været om bord på skibe. Ligeledes har toldvæsnet bemyndigelse til at foretage undersøgelse af personer, som er tilstede på havneområdet, når toldvæsenet skønner, at der er grundlag herfor.«

20. Som § 29 indsættes:
»§ 29. Ved kontrollen med ind- og udførsel af varer m.v. er toldvæsenet berettiget til at foretage eftersyn af personer, som indrejser og udrejser.
*Stk. 2.* Medmindre undersøgelser begrænses til ydre beklædning, må eftersyn på personer kun foretages, når dette giver rimelig grund til at antage, at vedkommende ulovligt medfører noget skjult på sin person. Om toldvæsenets adgang til at kræve politiets medvirken ved eftersyn, gælder samme regel som for toldvæsenets forretninger iøvrigt.
*Stk. 3.* Eftersyn af personer må kun foretages efter ordre fra den øverste tilstedeværende overordnede toldtjenestemand. Eftersynet skal ske med størst mulige hensynsfuldhed og må ikke være videregående end det kontrolmæssige formål nødvendiggør.
*Stk. 4.* Eftersynet må kun udføres og overværes af personer af samme køn som den person, der skal efterses og og kan forlange vidne tilkaldt at overvære eftersynet.
*Stk. 5.* Toldvæsenet er bemyndiget til at forfølge og standse personer og transportenheder, der har unddraget sig eftersyn, og som skønnes at have toldpligtige varer om bord eller varer, det er forbudt at importere. I sådanne tilfælde har toldvæsenet ret til at foretage husundersøgelser i transportenheder, såfremt dette foretages i direkte fortsættelse af eftersyn.

§ 2. Denne lov træder i kraft 1. november 1983.

*Viðmerkingar:*
Arbeitt hevur verið seinasta árið við at gera nýggja tolllóg. Endamálið er at náa fram til eina tollfóg, sum grundar seg á vørubólking sambært

CCCN-nomenklaturin, eisini nevndur Bruxelles-nomenklaturin, og sum flest øll framkomin lond nýta í dag. At gera eina nýggja tolllóg er eitt stórt arbeiði, og nær hetta verður liðugt, kann ikki sigast við vissu enn.

Til tann tíð kemur, verður neyðugt at gera broytingar í galdandi tolllóg, tó so at havt verður í huga, at hesar broytingar bera fram ímóti teirri nýggju tolllógini, tá um vørubólking ræður.

Høvuðsbroytingarnar eru hesar:

1. Motorakførini eru tikin burtur úr tolllógini, og gjørd er serlig lóg um skráseting av motorakførum.
2. Tollskylduga virðið er neyvari lýst og verður nú í roynd og veru eitt FAS-virði (Free Alongside Ship).
3. Bøkur og bløð verða tollað eins og videobond til leigu.
4. Tollur av drykkjuvørum verður broyttur soleiðis, at borðvín verður ódýrari og brennivín verður dýrari.
5. Punktgjald verður sett á blómur og pottaplantur og ávís fimleikaramboð.
6. Uppskot er um neyvari reglur at galda fyri virksemi tollvaldsins.

Torført er at siga við vissu, hvussu stór meirinntøka landskassans stendst at teim broyttu tollgjøldunum og serliga av teirri neyvari lýsingini av tollskylduga virðinum.

| Leysliga mett er árliga meirinntøkan hendan: | mió. kr. |
|---|---|
| Bøkur, bløð, videobond v.m. | 2 |
| Drykkjuvørur | 2 |
| Blómur, pottaplantur, famkallan av filmum v.m. | 1 |
| Skrásetingargjald av motorakførum | 10 |
| Avtøka av punktgjaldinum fyri eykalutir til akfør | : 5 |
| | 10 |

Aðrar avleiðingar ber ikki til at seta tøl á. Tó verður mett, at neyvari áseting av tollskylduga virðinum fer at geva nakað til landskassan.

## II

## Uppskot
## til
## løgtingslóg um broyting í serligum innflutningsgjaldi.

**§ 1.** Í løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 við seinni broytingum um serligt innflutningsgjald verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 2 verður í staðin fyri »skip« sett: »skip og bátar yvir 5 brt. reg. tons.«
2. Í somu grein verða orðini »bøkur og bløð« strikað.
3. Í § 2, pkt 8, verður orðingin nú broytt soleiðis:
»Fiskaalistøðir og smoltstøðir og føst útgerð til hesar, maskinur til fiskiídnað.
4. Í § 2 verður pkt. 15 broytt til soljóðandi:
»navigatións-, siglingar-, leitingar- og kommunikatiónsútgerð, skipsmotorum, ljósmotorum, egningarmaskinum, skrúvudysum, kraftblokkum, trolspølum, snurpispølum og øðrum skipsspølum, treytað av at lutirnir hava eitt innflutningsvirði, ið ikki er undir

§ 1. I lagtingslov nr. 9 af 27. april 1961 med senere ændringer om særlig indførselsafgift foretages følgende ændringer:

1. I § 2 indsættes i stedet for »skibe«: »skibe og både over 5 brt. reg. tons.«
2. I samme paragraf udgår ordene »bøger og blade«.
3. I § 2, pkt. 8 ændres formuleringen således: »Fiskeopdrætanlæg og smoltanlæg og fast udrustning til disse. Maskiner til fiskeindustri.
4. I § 2 ændres pkt. 15 til sålydende:
»navigations-, besejlings-, eftersøgnings- og kommunikationsudstyr, skibsmotorer, lysmotorer, agnmaskine, skruedyser, kraftblokke, trawlspil, snurpespil og andre skibsspil på betingelse af at delene ikke har en værdi under kr. 10.000,00.

kr. 10.000,00.

**5.** Í § 2 verður sett sum nýtt pkt. 16:

»Eftir umsókn kann landsstýrið endurrinda innflutningsgjaldið fyri bátamotorar, tá innflutningsvirðið er ikki undir kr. 10.000,00, tá neyðug prógv eru fingin fyri, at motorurin er ísettur far, ið burturav verður nýtt til fiskivinnu, og at motorurin er ikki ísettur nýbygning.«

**6.** § 3 verður soljóðandi:

«Tann gjaldskylduga nøgdin av eini vøru verður at rokna eftir faktura ella eftir, hvat innballingin vísir eftir teirri uppgávu fyri stødd, sum vanligt er í handilsviðurskiftum.

*2. stk.* Tað gjaldskylduga virðið av eini vøru er fakturaprísurin við frádrátti fyri møguligan avsláttur, og uttan at lagt afturat er innflutningsgjald eftir hesi lóg, kostnaður fyri flutningsfløt, trygging og flutningsútreiðslur v.m. frá avskipingarhavn til Føroya.

*3. stk.* Ikki verður við inklarering roknað við avslátti, uttan so at hesin er frádrigin sjálvum fakturanum. Framleiðsluútreiðslur, útreiðslur til innballing, frysting, skering, merking, pakking og goymslu, eins og flutnings- og aðrar útreiðslur til av-

**5.** I § 2 indsættes som nyt pkt. 16:

»Efter ansøgning kann landsstyret refundere indførselsafgiften for bådemotorer, når indførselsværdien er ikke under kr. 10.000,00, når der er tilvejebragt nødvendigt bevis for, at motoren er isat fartøjet, som i overvejende stærk grad anvendes til fiskerierhverv, og at motoren ikke er isat en nybygning.«

**6.** § 3 formuleres således: »Den afgiftspligtige mængde af en vare regnes efter faktura eller efter hvad emballeringen udviser eller i henhold til den angivelse for størrelse, der er sædvanlig i handelsforhold.

*Stk. 2.* Den afgiftspligtige værdi af en vare er fakturaprisen med fradrag af mulig rabat, uden at der er tillagt indførselsafgift i henhold til denne lov, udgifter for emballage, forsikring og transportudgifter m.v. fra afskibningshavn til Færøerne.

*Stk. 3.* Ved inklarering regnes kun med rabat, såfremt denne er fratrukket selve fakturaen. Produktionsomkostninger, udgifter til emballage, indfrysning, skæring, mærkning, indpakning og lager, såvelsom transport og andre udgifter til afskibningshavn fra-

skipingarhavn verða ikki drignar frá gjaldskylduga virðinum, tá toll- og innflutningsgjald verða roknað.

*4. stk.* Um tann veruliga nøgdin ella virðið av eini vøru ikki kann ásannast, sbr. omanfyri, verður nøgd ella virði ásett av gjaldsvaldinum.

*5. stk.* Umrokning frá fremmandum til føroyskan pening verður eftir peningsvirðinum tann dagin, tollgreiðsla fer fram.«

trækkes ikke den afgiftspligtige værdi, når told og indførselsafgifter regnes.

*Stk. 4.* Kan varens rigtige mængde eller værdi ikke godtgøres som forannævnt, fastsættes mængden eller værdien af den opkrævende myndighed.

*Stk. 5.* Omregning fra fremmed til færøsk mønt sker efter kursen den dag, toldberigtigelse sker.«

§ 2. Henda lóg fær gildi 1. november 1983.

§ 2. Denne lov træder i kraft 1. november 1983.

*Viðmerkingar:*
Víst verður til viðmerkingarnar undir upskoti I.

## III

## Uppskot
## til
## løgtingslóg um broyting í eykainnflutningsgjaldinum.

§ 1. Í løgtingslóg nr. 32 frá 19. mai 1979 við seinni broytingum um serligt innflutningsgjald verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 2 verða »bøkur, bløð« strikað.
2. § 3 verður soljóðandi:
   »Tann gjaldskylduga nøgdin av eini vøru verður at rokna eftir faktura ella

§ 1. I lagtingslov nr 32 af 19. maj 1979 med senere ændringer om ekstra indførselsafgifter foretages følgende ændringer:

1. I § 2 udgår »bøger, blade«.

2. § 3 formuleres således:
   »Den afgiftspligtige mængde af en vare regnes efter faktura ellar efter hvad

eftir, hvat innballingin vísir ella eftir teiri uppgávu fyri stødd, sum vanligt er í handilsviðurskiftum.

*2. stk.* Tað gjaldskylduga virðið av eini vøru er fakturaprísurin við frádrátt fyri møguligan avslátt, og uttan at lagt afturat er innflutningsgjald eftir hesi lóg, kostnaður fyri flutnings fløt, trygging og flutningsútreiðslur v.m. frá avskipingarhavn til Føroya.

*Stk. 3* Ikki verður við inklarering roknað við avslátti, uttan so at hesin er frádrigin sjálvum fakturanum. Framleiðsluútreiðslur, útreiðslur til avskipingarhavn verða ikki drignar frá gjaldskylduga virðinum, tá toll- og innflutningsgjøld verða roknað.

*4. stk.* Um tann veruliga nøgdin ella virðið av eini vøru ikki kann ásannast sbr. omanfyri, verður nøgd ella virði ásett av gjaldsvaldinum.

*5. stk.* Umrokning frá fremmandum til føroyskan pening verður eftir peningsvirðinum tann dagin, goldið verður fyri vørurnar.«

§ 2. Henda lóg fær gildi 1. november 1983.

emballeringen udviser eller i henhold til den angivelse for størrelse, der er sædvanlig i handelsforhold.

*Stk. 2.* Den afgiftspligtige værdi af en vare er fakturaprisen med fradrag af mulig rabat, uden at der er tillagt indførselsafgift i henhold til denne lov, udgifter for transportemballage, forsikring og transportudgifter m.m. fra afskibningshavn til Færøerne.

*Stk. 3.* Ved inklarering regnes kun med rabat, såfremt denne er fratrukket selve fakturaen. Produktionsomkostninger, udgifter til emballage, indfrysning, skæring, mærkning, indpakning og lager, såvel som transport og andre udgifter til afskibningshavn fratrækkes ikke den afgiftspligtige værdi, når told og indførselsafgifter regnes.

*Stk. 4.* Kan varens rigtige mængde eller værdi ikke godtgøres som forannævnt, fastsættes mængden eller værdien af den opkrævende myndighed.

*Stk. 5.* Omregning fra fremmed til færøsk mønt sker efter kursen den dag, toldberigtigelse sker.«

§ 2. Denne lov træder i kraft den 1. november 1983.

*Viðmerkingar:*
Sí viðmerkingar undir uppskoti 1.

1. viðgerð 31. oktober. Málið varð viðgjørt saman við løgtingsmáli nr. 7: Løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum.

Bæði málini vórðu eftir ynski uppskotsstillarans beind aftur til landsstýrið.

F.L.j.nr. 430-12-36

---

# 2. Lækkan av skattalofti

Ár 1983, mánadagin 1. august legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løtingið áleggur landsstýrinum at lækka skattaloftið fyri ikki bókhaldsskyldugar inntøkur undir kr. 200.000,- niður um 20% í samband við at gingið verður yvir til samtíðarskatt, og at javna aftur mistar inntøkur við broytan av toll- og/ella innflutningsgjøldum.

*Viðmerkingar:*
Búskapar-, sosialar- og menningarbroytingar seinnu árini hava ført við sær eina vanliga hækkan av skattinum hjá tí einstaka, og hevur hetta ført við sær, at knípið er hjá mongum at fáa endarnar at røkka saman, hvat skatta- og aðrar eftirstøður eru prógv um. Skattaeftirstøðurnar tátta fram móti 400 milj. kr. Skatturin fevnir í løtuni yvir 40% av samlaðu inntøkunum, og kann tí roknast við, at onnur eftirstøða samsvarandi er um 600 milj. kr.

Tað er skylda politikkaranna at lóggeva soleiðis, at tað gerst so liviligt sum gjørligt fyri tann einstaka borgaran samstundis sum framburður og sosial trygging kann halda áfram.

Verður ein ársinntøka lutað sundur í tríggjar bólkar, nevnliga tann sum skal nýtast til skatt, tann sum skal nýtast til íbúðarútreiðslur og tann triði, sum skal nýtast til tað, ið tollur verður goldin av, siggja vit, at bert av tí triðja bólkinum hava fólk møguleikar at spara upp, tað veri seg til skatta- og/ella aðrar eftirstøður.

Tingið eigur at gera henda triðja bólkin so stóran sum gjørligt fyri at geva fólki møgulcika til uppsparing og konsolidering.

1. viðgerð 3. august. Málið varð beint í skattanevndina, sum 6. august legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av Adolf V. Hansen, løgtingsmanni, 1. august 1983 og undir 1. viðgerð 3. august beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið á fundi 7. august 1983, og setir nevndin einki uppskot fram.

2. viðgerð 6. august. Málið fall við 1 - 0 atkvøðu.

# 3. Løgtingslóg um havbotn og undirgrund Føroya

Ár 1983, hósdagin 4. august legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um havbotn og undergrund Føroya.**

Í samljóði við samtykt Sameindu tjóða frá 16. december 1966, sum gekk í gildi 3. januar 1976, samtykkir Føroya løgting hesa løgtingslóg um havbotn og undirgrund Føroya:

**§ 1.** Øll ráevni á havbotni og í undirgrund Føroya tilhoyra føroyska heimastýrinum, og er ongum loyvt ransóknir ella nýting av hesum náttúrgivnu ríkidømum uttan loyvi frá løgtingi og landsstýri.

**§ 2.** Yvirvaldsrættur heimastýrisins yvir havbotninum røkkur tann part av landgrunninum sum tilskilaður er í tí

**lagtingslov om Færøernes havbund og undergrund.**

I overensstemmelse med De forenede Nationers komvention af 16. december 1966 med gyldighed fra 3. januar 1976 vedtager Føroya Løgting følgende lagtingslov om Færøernes havbund og undergrund:

**§ 1.** Alle råstoffer på Færøernes havbund og i Færøernes undergrund tilhører det færøske hjemmestyre og ingen må uden bevilling fra lagtinget og landsstyret foretage udforskning eller udnytte disse naturgivne rigdomme.

**§ 2.** Hjemmestyrets højhedsret over havbund dækker den del af den kontinentale sokkel, der er nævnt i De Forenede Nation-

altjóðasáttmála, sum varð undirritaður í Geneve 29. apríl 1958.

**§ 3.** Marknaðarnevnd løgtingsins verður álagt at evna til lógaruppskot, sum setir nærri lógarreglur um henda føroyska ognar- og yvirvaldsrætt, har í millum lógarreglur viðvíkjandi kanningum og nýting av ráevnum í undirgrund og á havbotni.

**§ 4.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 1984.

ers konvention, undertegnet i Genéve den 29. april 1958.

**§ 3.** Lagtingets Markedsudvalg bemyndiges til at udarbejde lovudkast, der nærmere regulerer hjemmestyrets ejendoms- og højhedsret, særlig vedrørende efterforskning og udnyttelse af råstoffer i undergrund og på havbunden.

**§ 4.** Denne lagtingslov træder i kraft den 1. januar 1984.

*Greinargerð:*

Viðvíkjandi undirgrund Føroya er í gildi donsk lig nr. 181 fra 8. mai 1950, sum í § 1 sigur:»Råstoffer i kongeriget Danmarks undergrund ... tilhører den danska stat. Efterforskning og indvinding af sådanne råstoffer forbeholdes staten«.

Viðvíkjandi havbotni Føroya er í gildi donsk anordning nr. 259 fra 7. juni 1963, sum í § 1 sigur: »Dansk højhedsret udøves, for så vidt angår udforskning og udnyttelse af naturforekomster, over den del af den kontinentale sokkel, der efter de i Genéve den 29. april 1958 undertegnede konvention om den kontinentale sokkel ... tilhører det danske rige.«

Føroya løgting hevur fyrst árið 1975 og aftur árið 1983 samtykt, at málsøkið undirgrund Føroya og havbotnur verður yvirtikið sum føroyskt sermál.

Henda samtykt er í fullum samljóði við Samtykt sameindu tjóða frá 16. december 1966, ið gekk í gildi 3. januar 1976, sum sigur: »All peoples may, for their own ends, freely dispose of their natural resources without prejudice to any obligations arising out of international economic cooperation, based upon the principle og mutual benefit and international law. In no case may a people be deprived of its own subsistence.«

»Nothing in the present Convenant shall be interpreted as impairing the inherent right of all peoples to enjoy and utilize fully and freely their natural wealth and resources.«

Av hesi altjóðasamtykt er tað skilligt, at ognar- og yvirvaldsrætturin

yvir ráevnum í undirgrund og havbotni Føroya tilkemur Føroya fólki, og er hetta lógaruppskot, sum leggur henda ognar- og yvirvaldsrætt undir føroyska heimastýri, løgting og landsstýri, í fullum samljóði við hesa altjóðasamtykt.

Av tí at danska lógin frá 1950 um undirgrundina og danska anordning fra 1963 um havbotnin stríða móti hesi altjóðasamtykt, má henda lóg og henda anordning fáast úr gildi, samtíðis sum hetta lógaruppskot kemur í gildi, t.e. 1. januar 1984. Henda skylda hvílir á donsku ríkismyndugleikunum.

1. viðgerð 6. august. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fyri tingið av Tjóðveldisflokkinum 4. august 1983 og við 1. viðgerð, sum fór fram 6. august 1983, varð tað beint í Marknaðarnevndina, sum hevur viðgjørt málið.

Ein samd nevnd mælir til at kanna málið gjøllari, áðrenn støða verður tikin í málinum. Kanningar fara fram, og málið verður tí verandi í marknaðarnevndini.

2. viðgerð 7. mai. Málið samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

F.L.j.nr. 1201-7.

---

# 4. Setan av nevnd at gera nýggja umhvørvislóg

Ár 1983, hósdagin 4. august legði Petur Reinert, løgtingsmaður vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi:

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Føroya Løgting áleggur landsstýrinum beinanvegin at seta niður nevnd at gera uppskot til nýggja umhvørvislóg, sum skal umfata alt umhvørvið í Føroyum, og leggja úrslitið fyri løgtingið, áðrenn tingsetan er komin at enda.

*Viðmerkingar:*
28. apríl 1982 viðtók løgtingið við 28 atkvøðum at heita á landsstýrið at skipa fyri uppskoti til umhvørvislóg. Eitki røktist fyri, at landsstýrið var farið undir hetta arbeiði við ársbyrjan.

Løgmaður varð tí spurdur, hvat landsstýrið hevði gjørt í hesum máli.

3 mánaðir gingu, áðrenn løgmaður svaraði, og svarið var av slíkum slagi, at tað má tykjast púra greitt, at løgmaður yvirhøvur ikki ætlar sær at akta tingsamtyktina frá 28. aðríl 1982.

Tað er hugsan tjóðveldisfloksins, at stórur bráðneyðugur tørvur er á umhvørvislóggávu. Vit vita frá álítandi vælvitandi keldum, at væl samansett fyrireikingarnevnd ikki tørvaði meira enn 3-4 mánaðir at gera slíkt lógaruppskot.

1. viðgerð 26. oktober. Málið varð beint í umhvørvisnevndina, sum 9. mai 1984 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 3. august og undir 1. viðgerð 26. oktober beint í umhvørvisnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 3. mai 1984, og hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Arne Ziskasen, Vilhelm Johannesen og Petur Reinert) setir fram soljóðandi

## Uppskot
## til
## samtyktar

Føroya Løgting áleggur landsstýrinum beinanvegin at seta nevnd at gera uppskot til nýggja umhvørvislóg, sum skal umfata alt umhvørvið í Føroyum, og leggja úrslitið fyri løgtingið í ólavsøkutingsetuni 1984.

Ein minniluti (Asbjørn Joensen og Ivan Johannesen) setir einki uppskot fram.

2. viðgerð 9. mai. Málið varð avgreitt uttan atkvøðugreiðslu.

F.L.j.nr. 937-4

# 5. Fíggjan av svartkjaftavirki í Gøtu og í Kollafirði

Ár 1983, hósdagin 4. august legði Petur Reinert, løgtingsmaður fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Føroya Løgting áleggur Føroya Landsstýri at taka upp samráðingar við teir menn og tey feløg, sum standa aftan fyri ætlanirnar at byggja svartkjaftavirki í Gøtu og Kollafirði, at finna fíggjanarmøguleikar til byggingina av hesum virkjum og at leggja úrslitið av hesum kanningum fyri tingið áðrenn 31. december 1983.

*Viðmerkingar:*

Í seinastu tingsetu legði undirritaði fram uppskot um bygging av tveimum svartkjaftavirkjum - eitt í Gøtu og hitt í Kollafirði. Málið fekk drúgva viðgerð í tinginum og fíggjarnevndini, men úrslitið varð, at málið fall, samgonguflokkarnir sóu seg ikki førar fyri at atkvøða fyri tí, eina mest kanska tí løgmaður og fráfarni fiskimálaráðharrin hildu bestu ráðini vera at byggja svartkjaftadeildir í verandi fiskavirkjum.

Løgmansrøðan í ár kundi týtt uppá, at samgongan hevði skift hugsunarhátt.

Løgmaður sigur á síðu 11: »Annars eru umsóknir um bygging av nýggjum stórum svartkjaftavirkjum á landi. Tá landsstýrið ikki metir, at fíggingarmøguleikar eru til reiðar at fíggja tílík tiltøk enn, hetta er váttað frá ávísum stovnum, so hevur landsstýrið ikki avgreitt hesar umsóknir enn.

Líka so skjótt fíggjan fæst eftir vanligum reglum, fer landsstýrið at stuðla bygging av tílíkum virkjum.«

Eg eri ivaleysur í, at slík fíggjan kann fáast í lag, um ikki á »vanligan« so á onkran hátt, og loyvi eg mær við hesum at seta fram omanfyristandandi.

1. viðgerð 26. oktober. Málið varð beint í fíggjarnevndina og er ikki aftur komið hagani.

# 6. Løgtingslóg um ásetan av skatti til landskassan

Ár 1983, hósdagin 4. august legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til løgtingslóg um ásetan av skatti til landskassan.**

**Lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.**

## 1. kapitul.

§ 1. Vísandi til § 54 í løgtingslóg nr. frá um landsskatt og kommunuskatt (samtíðarskattur) verður skattur teirra, ið nevnd eru í § 1 nr. 1 - 6 í somu lóg og teirra, ið nevnd eru í § 2, til landskassan ásettur soleiðis:

Er inntøkan minni enn kr. 30.000, verður latið 20%.

| Er inntøkan kr. | men minni enn kr. | verður latið kr. | av kr. | og av restini % |
|---|---|---|---|---|
| 30.000 | 50.000 | 6.000 | 30.000 | 26 |
| 50.000 | 100.000 | 11.200 | 50.000 | 31 |
| 100.000 | 150.000 | 26.700 | 100.000 | 33 |
| 150.000 | 200.000 | 43.200 | 150.000 | 35 |
| 200.000 | 250.000 | 60.700 | 200.000 | 43,5 |
| 250.000 | 300.000 | 82.450 | 250.000 | 45,5 |
| 300.000 | | 105.200 | 300.000 | 47 |

## Kapitel 1.

§ 1. Under henvisning til § 54 i lagtingslov nr. fra om landsskat og kommuneskat (kildeskat) udskrives skatten for dem, der er omhandlet i nævnte lovs § 1 nr. 1-6 og for dem, der er omhandlet i § 2, til landskassen således:

Er indtægten mindre end kr. 30.000, erlægges 20%.

| Er indtægten kr. | men mindre end kr. | erlægges kr. | af kr. | og af resten % |
|---|---|---|---|---|
| 30.000 | 50.000 | 6.000 | 30.000 | 26 |
| 50.000 | 100.000 | 11.200 | 50.000 | 31 |
| 100.000 | 150.000 | 26.700 | 100.000 | 33 |
| 150.000 | 200.000 | 43.200 | 150.000 | 35 |
| 200.000 | 250.000 | 60.700 | 200.000 | 43,5 |
| 250.000 | 300.000 | 82.450 | 250.000 | 45,5 |
| 300.00 | | 105.200 | 300.000 | 47 |

**§ 2.** Fyri hvørt barnið, sum ikki er 16 á í byrjanini av tí álmanakkaári, sum skattur er ásettur, verða í útroknaða landsskattinum sambært § 1 í hesari lóg, hjá teimum skattskyldugu eftir § 1 nr. 1-6 í samtíðarskattalógini, drignar 1.800 kr. frá sbr. § 46, 3. stk. í somu lóg. Í hjúnarlag verður frádrátturin í skattium hjá manninum. Um hesin ikki fær nýtt frádráttin til fulnar, skal restin verða drigin frá í skattinum hjá móðurini, um hon er sett í skatt sambært § 4, 2. stk. í samtíðarskattalógini. Við barn meinast hjúnarbandsbarn, barn uttan hjúnarband, tá móðurin er skattgjaldarin, stjúkbarn, ættleitt barn ella fosturbarn, sum ikki er latið støðugt fosturviðurlag fyri. Er barna frádrátturin hægri enn skatturin uttan barnafrádrátt, verður munurin útgoldin avvarðandi skattgjaldara. Føroya Gjaldstova rindar peningin í oktober mánað.

**§ 2.** For hvert barn, som i begyndelsen af det kalenderår, for hvilket skatten udskrives, er under 16 år, gives der i de i kildeskattelovens § 1, nr. 1-6 nævnte skattepligtige personer et fradrag på 1.800 kr. i den i henhold til § 1 i denne lov beregnede skatt. Ægtemanden oppebærer fradraget. Hvis denne ikke kan udnytte fradraget fuldt ud, bliver resten at fradrage hos moderen, hvis denne er ansat til skat ifølge § 4, stk. 2 i kildeskatteloven. Ved barn forstås ægtebarn, barn uden for ægteskab, når moderen er er skattepligtig, stedbarn, adoptivbarn eller plejebarn, for hvis pleje, der ikke ydes vedvarende vederlag, er børnefradraget større end skatte uden børnefradrag, udbetales differencen til den pågældende skatteborger. Føroya Gjaldstova udbetaler beløbet i oktober måned.

**§ 3.** Hvør persónur, sum er undir fullari skattskyldu eftir reglunum í § 1 í samtíðarskattalógini, og sum er settur sjálvstøðugt í skatt sambært reglunum í somu lóg, fær í útroknaða landsskattinum ein persónsfrádrátt.

*2. stk.* Fyri hvønn persón sær verður persónsfrádrátturin 4.000 kr. Fyri leysar persónar yvir 67 ár og leysar persónar, sum fáa

**§ 3.** Enhver person, som er fuldt skattepligtig ifølge § 1 i kildeskatteloven, og som er selvstændig ansat til skat efter de i samme lov gældende regler, indrømmes der et personfradrag, der fradrages i den udregnede landsskat.

*Stk. 2.* For hver enkelt person udgør personfradraget kr. 4.000. For enlige personer over 67 år samt enlige personer, som oppe-

avlamis-, einkju ella fólkapensjón verður persónsfrádrátturin tó 9,500 kr. Fyri giftar persónar yvir 67 ár og giftar persónar, sum fáa avlamis- ella fólkapensjón verður persónsfrádrátturin tó 6.700 kr.

*3. stk.* Har bert annar hjúnafelagin hevur skattskylduga inntøku, ella har hjúnafelagar eru skattaðir hvør sær sambært § 4, 2. stk. í samtíðarskattalógini, og annar teirra ikki fær nýtt sín persónsfrádrátt til fulnar, skal tann heilt ella partvíst ónýtti persónsfrádrátturin verða drigin frá í skattinum hjá hinum hjúnafelagnum, sbr. § 47, 2. stk. í somu lóg.

**§ 4.** Rentur, sum ikki koma undir frádrátt eftir § 33 í samtíðarskattalógini, verða drignar frá í útroknaða landsskattinum við 28% av rentuupphæddini, sbr. § 46, 2.stk. í somu lóg. Hjúnafelagar avgera sjálvir, hvussu rentur, sum ikki koma undir frádrátt eftir § 33 í nevndu lóg, skulu býtast teirra millum. Tó má samlaði frádrátturin, tey fáa í landsskattinum, ikki fara upp um 28% av samlaðu rentuútreiðslunum teirra. Um so er, at samlaði landsskatturin hjá hjúnafeløgum, aftaná at 28% av samlaðu rentuútreiðslum teirra er frádrigin, tá vísir hall, kann hetta verða drigið frá í landsskattinum árið eftir. Hjúnafelagar avgera tá sjálvur, hvussu

bærer invalide-, enke- eller folkepension, er personfradraget dog 9.500. For gifte personer over 67 år samt gifte personer, som oppebærer invalide- eller folkepension, er personfradraget dog kr. 6.700.

*Stk. 3.* Hvis kun den ene af ægtefællerne har skattepligtig indtægt, eller hvis ægtefæller er ansat til skat hver for sig efter § 4, stk. 2 i kildeskatteloven, og den ene ikke fuldt ud kan udnytte sit personfradrag, kan det helt eller delvist ubenyttede personsfradrag fradrages i den anden ægtefælles skat, jfr. § 47, stk. 2 i samme lov.

**§ 4.** Renter, der ikke kan fradrages efter § 33 i kildeskatteloven, fradrages i den udregnede landsskat med 28% af rentebeløbet. Ægtefæller af gør selv, hvorledes de renteudgifter, som ikke kan fradrages ifølge § 33 i nævnte lov, skal fordeles mellem dem. Deres samlede fradrag i landsskatten må dog ikke overstige 28% af deres samlede renteudgifter. Hvis nu ægtefællernes samlede landsskat bliver negativ efter fradrag af 28% af deres samlede renteudgifter, kan det negative beløb fradrages i næste års landsskat. Ægtefællerne afgør selv, hvorledes dette beløb skal fordeles mellem dem.

hetta hallið verður býtt teirra millum.

**2. kapitul.**

**§ 5.** Vísandi til § 54 í samtíðarskattalógini verður skattur teirra, ið nevnd eru í § 1 nr. 8-14 í somu lóg og teirra, ið nevnd eru í § 2 við avmarkari skattskyldu, til landskassa og kommunu ásettur soleiðis:

Er inntøkan minni enn kr. 100.000 verður latið 27%

| Er inntøkan | men minni enn | verður latið | av | og av restini |
|---|---|---|---|---|
| kr. | kr. | kr. | kr. | % |
| 100.000 | 200.000 | 27.000 | 100.000 | 37 |
| 200.000 | 500.000 | 64.000 | 200.000 | 48 |
| yvir | 500.000 | 208.000 | 500.000 | 49 |

Skatturin verður býttur við 30% sum kommunuskattur og 70% sum landsskattur.

**3. kapitul.**

**§ 6.** Vísandi til § 54 í samtíðarskattalógini verður skatturin til landskassan hjá deyðsbúgvum við óavmarkaðari skattskyldu eftir § 1, nr 7 í lóg og hjá deyðsbúgvum við avmarkaðu skattskyldu eftir § 2 40% av samlaðu inntøkuni. Búgv, sum lúka treytirnar í § 15, 2. stk. í samtíðarskattalógini fáa tó ein frádrátt í skattskyldugu inntøkuni uppá 25.000 kr.

**Kapitel 2.**

§ 5. Under henvisning til § 54 i kildeskatteloven udskrives skatten for dem, der er omhandlet i nævnte lov § 1 nr. 8-14 og for dem, der er omhandlet i § 2 med ubegrænset skattepligt, til landskasse og kommune således:

Er indtægten mindre end kr. 100.000 erlægges 27%

| Er indtægten | men mindre end | erlægges | af | og af restenen |
|---|---|---|---|---|
| kr. | kr. | kr. | kr. | % |
| 100.000 | 200.000 | 27.000 | 100.000 | 37 |
| 200.000 | 500.000 | 64.000 | 200.000 | 48 |
| over | 500.000 | 208.000 | 500.000 | 49 |

Denne skat fordeles med 30% som kommuneskat og 70% som landsskat.

**Kapitel 3.**

**§ 6.** Under henvisning til § 54 i kildeskatteloven udskrives skatten til landskassen for dødsboer med ubegrænset skattepligt i henhold til § 1 nr. 7 i samme lov og for dødsboer med begrænset skattepligt i henhold til § 2 med 40% af den samlede indtægt. Boer, som opfylder betingelserne i § 15, stk. 2 i kildeskatteloven får dog et fradrag i den skattepligtige indkomst på kr. 25.000.

**4. Kapitul.**

§ 7. Av royalty, sbr. 2, 1. stk. c) í samtíðarskattalógini verður ásett eitt fast avgjald uppá 25%. Avgjaldið verður býtt við 40% til avvarðandi kommunu og 60% til landskassan.

**5. kapitul.**

**§ 8.** Nær henda lóg fær gildi verður ásett við kunngerð frá Føroya landsstýri.

**Kapitel 4.**

**§ 7.** Af royalty, jfr. § 2, stk. 1, c) i kildeskatteloven udskrives der en fast afgift på 25%. Afgiften fordeles med 40% til pågældende kommune og 60% til landskassen.

**Kapitel 5.**

**§ 8.** Tidspunktet for lovens ikrafttræden fastsættes ved bekendtgørelse fra Færøernes landsstyre.

*Viðmerkingar:*

Í løgtingslóg um samtíðarskatt, sum tingið samtykti í vár, smb. løgtingsmál nr. 88/1982, er tann parturin sum viðvíkur útrokning av landsskatti ikki tikin við.

Tessvegna er gjørt serstakt uppskot til lóg um, hvussu inntøkuskattur verður at rokna, ávíkavíst fyri persónar og feløg.

Skattatalvan er tilevnað og frádráttirnir ásettir soleiðis fyri persónar, at tann meirinntøka, sum núgaldandi talva og frádráttir óbroyttir høvdu givið landskassanum í eini samtíðarskattaskipan verður latin út aftur og solciðis, at broytta talvan í mest møguligan mun kemur láginntøkunum til góða.

Høvuðstættirnir í lógaruppskotinum eru hesir:

Í fin degressivi frádrátturin er roknaður inn í skattatalvuna, solciðis at persónsfrádrátturin nú er føst upphædd.

Persónsfrádrátturin er hækkaður fyri ávísar bólkar, tó mest fyri pensionistar.

Skattaloftið eins og skattaprocentið fyri tær hægru inntøkurnar er óbroytt í mun til núgaldandi talvu.

Skattaprocentið er lækkað fyri inntøkur undir kr. 150.000,-.

Barnafrádrátturin er hækkaður úr kr. 1.200,- til kr. 1.800,-.

Skattatalvan fyri partafeløg verður óbroytt í mun til galdandi talvu.

Landsstýrið gongur út frá, at kommunurnar, eins og mælt er tinginum til fyri lág- og miðalinntøkur, lækka álíkningarprocentið, og ikki taka sær ágóða, sum stendst av óbroyttum skattaprocenti,

nú farið verður undir samtíðarskatt.

*Viðmerkingar til tær einstøku lógargreinarnar.*

**Til § 1.**

Broytingarnar, sum framdar eru í persónsskattatalvuni, eru fyri tað fyrsta, at tey bæði lægstu inntøkumarkini eru flutt uppeftir. Fyri tað næsta er procenttalið lækkað við 4% fyri inntøkur millum 50.000,- og 100.000,- kr. Triðja broytingin í talvuni er, at sett eru tvey nýggj inntøkumark, ávíkavíst 100.000,- og 150.000, kr. Procenttalið er lækkað við 3% fyri inntøkur millum 100.000,- og 150.000,- kr. og við 1% millum 150.000,- og 200.000,- kr. Fjórða broytingin í talvuni er, at degressiónin í persónsfrádráttinum er flutt í talvuna, soleiðis at procenttølini av hesi orsøk hækka við 1% fyri inntøkur omanfyri 100.000,- kr. Hetta førir við sær, at persónsfrádrátturin verður ein føst upphædd uttan mun til inntøkuupphæddina hjá tí einstaka skattaborgaranum.

**Til § 2.**

Barnafrádrátturin er broyttur úr núgaldandi 1.200,- kr. til 1.800,- kr.

**Til § 3.**

Umframt fyrr nevndu broyting, sum ber í sær, at persónsfrádráttirnir nú eru fastar upphæddir, eru upphæddirnar í sær sjálvum eisini broyttar. Persónsfrádrátturin er nú hin sami fyri øll burtursæð frá pensionistum, nevnliga 4.000,- kr. Fyri pensionistar er upphæddin hækkað við 3.000,- kr. pr. persón, soleiðis at upphæddirnar nú eru 9.500,- kr. og 6.700,- kr. ávíkavist fyri leys og gift.

**Til § 4 og § 5.**

Her eru ongar broytingar gjørdar í mun til galdandi reglur.

**Til § 6.**

Her er ásett, at deyðsbúgv rinda skatt við 40% av skattskyldugu inntøkuni aftaná ein frádrátt uppá 25.000,- kr.

**Til § 7.**

Her verður ásett, at av royalty skal svarast eitt avgjald uppá 25%.

1. viðgerð 6. august. Málið varð beint í skattanevndina. sum sama dag á seinni fundi legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av landsstýrinum og varð undir 1. viðgerð 6, í hesum beint í skattanevndina.

Undir nevndarviðgerðini býtti nevndin seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eli Nolsøe, Jógvan Sundstein og Hilmar Kass) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað. meirilutin tekur undir við, at kommununar lækka líkningarprosentið við 1/10, soleiðis sum landsstýrið hevur mælt til í viðmerkingunum.

Saman við málinum varð sent skattanevndini mótmælisskriv viðvíkjandi skattastiganum frá Føroya Fiskimannafelag, Føroya Arbeiðarafelag, Starvsmannafelagnum og Føroya Handverkarafelag, sum biðja um at vera boðsend, tá málið kemur til viðgerðar í skattanevndini. Feløgini vórðu boðsend í dag, men tað bar teimum ikki til at møta.

Saman við álitinum verða lagdar útrokningar yvir skattin, sum hann hevði verið eftir galdandi lóg samanhildið við uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Vilhelm Johannesen og Finnbogi Isaksen) mótmælir harðliga, at málið ikki fær nakra veruliga viðgerð í skattanevndini, og at tey løntakarafeløg, sum hava sent tinginum skriv hesum máli viðvíkjandi, ikki fá høvi at møta í skattanevndini at greiða frá sjónarmiðum teirra.

Tá minnilutin ikki kann fáa rímiliga tíð til viðgerð av málinum, kann minnilutin einki uppskot seta fram, og kann minnilutin tí heldur ikki luttaka í viðgerðini av málinum.

*Sí skjal 3.*

2. viðgerð 6. august. Uppskot frá Adolf V. Hansen um at beina málið aftur í skattanevndina fall við 1 - 0 atkvøðu.

§§ 1 - 8 samtyktar við 17 - 1 atkvøðu, at fara til 3. viðgerð samtykt við 17 - 0.

Frávik í tíðarfreistini til 3. viðgerð varð givið við 17 - 0 atkvøðum.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Málið soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 17 - 1 atkvøðum.

Lóg nr. 87 frá 1. sept. 1983.

# 7. Løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum.

Ár 1983, leygardagin 6. august legði Torbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum.**

§ 1. Fyri motorakfør, ið innflutt verða, verður ásett skrásetingargjald, sum byggir á gjald av virði og gjald av vekt akfarsins.
*2. stk.* Gjaldið verður at rinda Føroya gjaldstovu samstundis sum akfarið verður skrásett.

§ 2. Virðisgrundarlagið er søluprísurin frá seljara í Føroyum til keypara, tá akfarið er útgjørt við allari vanligari útgerð og eykaútgerð og ikki er fróknað skrásetingargjald, trygging, vegskattur o.t. í Føroyum. Vektgjaldsgrundarlagið er typugóðkenda vektin av akfarinum.
*1. stk.* Virðisgjald av persónbilum.

**Lagtingslov om indregistreringsafgift for motorkøretøjer.**

§ 1. For importerede motorkøretøjer fastsættes en indregistreringsafgift, der bygger på en værdiafgift og en vægtafgift.
*Stk. 2.* Afgiften betales til Færøernes oppebørselskontor samtidig med at køretøjet indregistreres.

§ 2. Værdigrundlaget er salgsprisen fra sælger på Færøerne til køber, når køretøjet er forsynet med standardudstyr og ekstraudstyr, men ikke medregnet indregistreringsafgift, forsikring, vejskatter o.l. på Færøerne. Vægtgrundlaget er den typegodkendte vægt af motorkøretøjet.
*Stk. 1.* Værdiafgift for personmotorkøretøjer.

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Undir kr. 8.000 | | kr. 20.000 | Under kr. 8.000 | | kr. 20.000 |
| kr. 20.000 | - | kr. 29.999 | kr. 20.000 | - | kr. 29.999 |
| kr. 8.000 | av | kr. 20.000 og 40% av restini | kr. 8.000 | af | kr. 20.000 og 40% af resten |
| kr. 30.000 | - | kr. 39.999 | kr. 30.000 | - | kr. 39.999 |
| kr. 12.000 | av | kr. 30.000 og 55% av restini | kr. 12.000 | af | kr. 30.000 og 55% af resten |
| kr. 40.000 | - | kr. 49.999 | kr. 40.000 | - | kr. 49.999 |
| kr. 17.500 | av | kr. 40.000 og 75% av restini | kr. 17.500 | af | kr. 40.000 og 75% af resten |
| kr. 50.000 | - | kr. 59.999 | kr. 50.000 | - | kr. 59.999 |
| kr. 25.000 | av | kr. 50.000 og 85% av restini | kr. 25.000 | af | kr. 50.000 og 85% af resten |
| kr. 60.000 | - | kr. 69.999 | kr. 60.000 | - | kr. 69.999 |
| kr. 33.500 | av | kr. 60.000 og 95% av restini | kr. 33.500 | af | kr. 60.000 og 95% af resten |
| kr. 70.000 | - | kr. 79.999 | kr. 70.000 | - | kr. 79.999 |
| kr. 43.000 | av | kr. 70.000 og 100% av restini | kr. 43.000 | af | kr. 70.000 og 100% af resten |
| kr. 80.000 | og | yvir | kr. 80.000 | og | over |
| kr. 53.000 | av | kr. 80.000 og 105% av restini | kr. 53.000 | af | kr. 80.000 og 105% af resten |

Vektgjald av personvognum roknað av eginvektini.

Vægtafgift for personvogne beregnet af egenvægt.

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 700 kg og undir | | kr. 15,00 pr. kg. | 700 kg og under | | kr. 15,00 pr. kg. |
| næstu 200 kg | - | 25,00 - - | næste 200 kg | - | 25,00 - - |
| - 200 - | - | 35.00 - - | - 200 - | - | 35,00 - - |
| - 200 - | - | 45,00 - - | - 200 - | - | 45,00 - - |
| restin | - | 55.00 - - | resten | - | 55,00 - - |

*2. stk.* Virðisgjald av hýruvognum.

| | |
|---|---|
| undir kr. 80.000 | 20% |
| kr. 80.000 og yvir | 30% |

*Stk. 2.* Værdiafgift for hyrevogne.

| | |
|---|---|
| under kr. 80.000 | 20% |
| kr. 80.000 og over | 30% |

Vektgjald av hýruvognum roknað av eginvekt.
700 kg og undir kr. 6,00 pr. kg.
næstu 200 kg .- 10,00 - -
- 200 - - 14,00 - -
- 200 - - 18,00 - -
restin - 22,00 - -

Munurin millum skrásetingargjald av persónvogni og hýruvogni verður endurrindaður úr landskassanum yvir eitt 2 ára skeið eina ferð árliga.

*3. stk.* Virðisgjald av bussum til 10 - 19 fólk, førarin íroknaður.
10 - 13 - 19%
14 - 16 - 7,5%
17 - 19 - 5%

Vektgjald av bussum til 10 - 19 fólk, førarin íroknaður.
Einki gjald

*4. stk.* Virðisgjald av bussum til 20 fólk ella fleiri, førarin íroknaður.
Einki gjald.
Vektgjald av bussum til 20 fólk ella fleiri, førarin íroknaður.
Einki gjald.

*5. stk.* Virðisgjald av last- og vøruvognum og dumpers, roknað av totalvekt.
a) Undir 2.000 kg av loyvdari tyngd 30%
b) 2.000 og yvir 0

Vektgjald av last- og vøruvognum og dumpers, roknað av

Vægtafgift af hyrevogne beregnet af egenvægt.
700 kg og under kr. 6,00 pr. kg.
næste 200 kg - 10,00 - -
- 200 - - 14,00 - -
- 200 - - 18,00 - -
resten - 22,00 - -

Forskellen mellem indregistreringsafgiften for personvogn og hyrevogn refunderes over en 2 års periode een gang årlig.

*Stk. 3.* Værdiafgift for busser til 10 - 19 personer fører iberegnet.
10 - 19 personer 19%
14 - 16 - 7,5%
17 - 19 - 5%

Vægtafgift for busser til 10 - 19 personer, føreren iberegnet.
Ingen afgift.

*Stk. 4.* Værdiafgift for busser til 20 personer eller flere, fører iberegnet.
Ingen afgift.
Vægtafgift for busser til 20 personer eller flere fører iberegnet.
Ingen afgift.

*Stk. 5.* Værdiafgift for last- og varevogne og dumpers, beregnet af totalvægt.
a) Under 2.000 kg. af tilladt vægt 30%
b) 2.000 kg og over 0

Vægtafgift for last- og varevogne og dumpers beregnet af total-

totalvekt.
a) Undir 2.000 kg av loyvdari tyngd kr. 5,50 pr. kg.
b) 2.000 kg og yvir men ikki yvir 3.500 kg: fast gjald kr. 12.000
c) yvir 3.500 kg: fast gjald kr. 10.000

*6. stk.* Virðisgjald av avlamisvognum 10%
Vektgjald av avlamisvognum einki gjald

*7. stk.* Virðisgjald av neyðsendaraakførum og líkvognum. einki gjald

Vektgjald av neyðsendaraakførum og líkvognum einki gjald

*8. stk.* Virðisgjald av motorsúklum.
a) undir kr. 22.000: 90%
b) kr. 22.000 og yvir 110%

Vektgjald av motorsúklum.
Einki gjald.

**§ 3.** Brúkt motorakfør.

Av brúktum motorakførum, sum innflutt verða, verður virðisgrundarlagið ásett av metingarmonnum Tryggingarsambandsins.

**§ 4.** Tollvaldið kann krevja alt skjala- og annað tilfar, ið seljarin av akfari nýtir til virðis- og vektgjaldsgrundarlagið, útflýggjað.

vægt.
a) Under 2.000 kg af tilladte a) vægt kr. 5,50 pr. kg.
b) 2.000 kg og over, men ikke over 3.500 kg: fast afgift kr. 12.000
c) over 3.500 kg: fast afgift kr. 10.000

*Stk. 6.* Værdiafgift for invalidevogne 10%
Vægtafgift for invalidevogne ingen afgift

*Stk. 7.* Værdiafgift for udrykningskøretøjer og rustvogne. ingen afgift

Vægtafgift for udrykningskøretøjer og rustvogne ingen afgift

*Stk. 8.* Værdiafgift for motorcykler.
a) under kr. 22.000: 90%
b) kr. 22.000 og over: 110%

Vægtafgift for motorcykler
Ingen afgift.

**§ 3.** Brugte motorkøretøjer.

For brugte motorkøretøjer, der importeres, fastsættes værdigrundlaget af Tryggingarsambandets vurderingsmænd.

**§ 4.** Toldvæsenet kan forlange alt dokument- og andet materiale, der af sælgeren anvendes som grundlag for værdi- og vægtafgiften, udleveret.

**§ 5.** Seljarin hevur skyldu til at leggja fyri tollvaldið teir til eina og hvørja tíð galdandi søluprísir.

*2. stk.* Seljarin hevur skyldu til at upplýsa fyri eintum og hvørjum, hvør prisurin er uttan at skrásetingargjald er íroknað, og hvussu mikið skrásetingargjaldið fyri seg er.

**§ 6.** Seljarin hevur skyldu at gera sáttmála fyri hvørt akfar, ið selt verður. Avrit av hesum sáttmála verður at lata tollvaldinum samstundis sum skrásetingargjaldið verður goldið.

**§ 7.** Fríkin fyri skrásetingargjald eru akfør, ið innflutt verða sum flytigóðs. Eigarmaðurin skal tá hava verið búsettur í hinum partinum av ríkinum ella í útlandinum í minsta lagi í 1 ár, og skal akfarið hava verið endaliga skrásett í hansara navni í minsta lagi 6 mánaðar í tí landinum, hann kemur úr, áðrenn hann kemur higar til landið.

**§ 8.** Landsstýrið verður heimilað við kunngerð at áseta nærri reglur og fyriskipanir hesi lóg viðvíkjandi.

**§ 9.** Fyri brot á reglum á hesi lóg eru revsireglurnar í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 við seinni broytingum í gildi.

**§ 5.** Sælgeren er forpligtet til at forelægge for toldvæsenet de til enhver til gældende salgspriser.

*Stk. 2.* Sælgeren er forpligtet til at informere købere om prisen uden at registreringsafgift er medregnet og om registreringsafgiftens størrelse.

**§ 6.** Sælgeren er forpligtet til at udfærdige kontrakt for hvert køretøj, der handles. Eenpart af kontrakten skal overlades til toldvæsenet samtidig med betaling af indregistreringsafgiften.

**§ 7.** Fritaget for indregistreringsafgift er motorkøretøjer, der indføres som rejsegods. Ejeren skal da have været bosiddende i den anden del af riget eller i udlandet i mindst 1 år, og skal køretøjet have været endeligt indregistreret i vedkommendes navn i mindst 6 måneder i det land, fra hvilket fraflytning sker, forinden indrejse her i landet.

**§ 8.** Landsstyret bemyndiges til med bekendtgørelse at fastsætte nærmere regler og bestemmelser i forbindelse med denne lov.

**§ 9.** For overtrædelse af reglerne i denne lov gælder straffebestemmelserne i lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 med senere ændringer.

**§ 10.** Tey í kapitul 68, 69, 70 og 72 í rættargangslógini nevndu rættarmiðal koma eisini í nýtslu í málum sum hesum í sama mun sum í málum, sum eftir vanligum reglum tilkoma statsadvokatinum at røkja. Er spurningurin at dømast at sita, skal tað sigast honum, sum undir ákæru er, at hann hevur rætt at fáa uppnevnt verja. Persónar, sum hýraðir eru við skipi í uttanlandssigling, og persónar, sum eru ikki búgvandi í landinum, sleppa ikki undan at eftirkoma avgerð frá tollvaldinum, til avgerð fyriliggur frá dómstólinum við at biðja um at fáa málið inn fyri rættin.

**§ 10.** De i lov om rettens pleje kap. 68, kap.69, kap. 70 og kap. 72 omhandlede retsmidler finder anvendelse på de pågældende sager i samme omfang som i sager, som det efter almindelige regler tilkommer statsadvokaten at forfølge. Er der spørgsmål om idømmelse af fængselsstraf, skal tiltalte gøres opmærksom på, at han har ret til at få beskikket en forsvarer. Personer, der er forhyret med skibe i udenrigsfart samt personer, der ikke er bosiddende her i landet, kan ikke ved at begære sagen indbragt for domstolene befri sig for forpligtelse til at efterkomme toldvæsenets afgørelse, indtil rettens afgørelse måtte foreligge.

**§ 11.** Henda lóg fær gildi 1. november 1983 og fara samstundis úr gildi punktini 27.01, 27.02, 27.03, 27.04, 27.05, 27.06, 27.08, 27.09, 27.10, 27.12 og stk. 2. i § 1 í løgtingslóg nr. 12 frá 11 februar 1950 við seinni broytingum um innflutningsgjald v.m.

**§ 11.** Denne lov træder i kraft 1. november 1983, og samtidig træder ud af kraft punkt 27.01, 27.02, 27.03, 27.04, 27.05, 27.06, 27.08, 27.09, 27.10, 27.12 og stk. 2 i § 1 i lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 med senere ændringer om indførelsesafgift m.v.

*Viðmerkingar:*

Landsstýrið arbeiðir við at gera uppskot til nýggja og nútíðar tolllóg. Sum ein liður í hesum arbeiði verður mælt til, at akfør verða tikin burtur úr tolllógini í tann mun, at punktgjøldini í staðin verða løgd um til eitt skrásetingargjald av motorakførum.

Hjálagda uppskot er evnað til í samráð við Felagið fyri bilhandlarar og verkstaðseigarar og er tillagað skipan, sum nýtt verður aðra-

staðir, eitt nú Noregi og Danmark.

Skrásetingargjaldið er sett saman av einum vekt- og einum virðisgjaldi og soleiðis, at uml. 1/3 av samlaða gjaldinum stavar frá vektgjaldinum og uml. 2/3 frá virðisgjaldinum.

Lógaruppskotið ber í sær, at smáir (lættir) bilar, sum eru kostnaðarmiklir at framleiða, verða heldur bíligari, meðan smáir tungir bilar, ið eru bíligari at framleiða [illegible] upp eins og luksusbilar fara upp.

Mælt verður til at strika punktgjaldið (23 %) av eykalutum til akfør.

Útrokningar vísa, at við óbroyttum innflutningsmynstri, verður inntøka landskassans av motorakførum einar 10 mió kr. størri. Orsakað av tí væntiliga broytta innflutningsmynstrinum, sum stendst av hesi lóg við øktum innflutningi av lættari akførum, og færri av teim tungu, er ilt at gera gjølliga meting av avleiðingunum fyri tollinntøkum landskassans. Gjøldini eru tí ásett soleiðis, at inntøkurnar undir ongum umstøðum koma at lækka.

Avtøkan av punktgjaldinum á eykalutum ber í sær eina minni inntøku fyri landskassan upp á einar 5 mió. kr. Ein so munandi lækking av tollinum á eykalutum verður mett at føra við sær munandi betri kappingarføri hjá føroysku bilverkstøðunum mótvegis teim útlendsku, eins og roknast má við eini øking í verkstaðsarbeiðinum.

Reglurnar um serligt og eykainnflutningsgjald verða at galda óbroyttar.

1. viðgerð 31. oktober. Málið varð viðgjørt saman við løgtingsmáli nr. 1: Ynisk inntøkulógaruppskot.

Bæði málini vórðu eftir ynski uppskotsstillarans beind aftur til landsstýrið.

F.L. j. nr. 403-6-3

# 8. Eykapensjónsskipan

Ár 1983, mikudagin 26. oktober legði Karin Kjølbro, løgtingslimur, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot til løgtingslóg um nevnd at kanna møguliga eykapensjónsskipan.**

§ 1. Løgtingið áleggur landsstýrinum at seta nevnd at kanna spurningin um fólk, sum ikki eru uppi í aðrari eftirlønaskipan enn fólkapensjónini, skulu hava eina eykapensjón.
*2. stk.* Nevndin gevur álit og tilmæli til landsstýrið.

§ 2. Nevndin verður heimilað at taka sær serkøna og aðra hjálp. Tær útreiðslur, ið standast av nevndararbeiðinum verða at gjalda úr landskassanum.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**Lagtingslov om nedsættelse af en kommision til undersøgelse af en eventuel tillægspensionsordning.**

§ 1. Lagtinget pålægger landsstyret til at nedsætte en kommision at undersøge spørgsmålet om personer, der ikke er med i nogen anden pensionsordning end folkepensionen, bør have en tillægspension.
*Stk. 2.* Kommisionen afgiver betænkning og indstilling til landsstyret.

§ 2. Kommisionen bemyndiges til at antage sagkyndig og anden medhjælp. Udgifterne ved kommisionsarbejdet afholdes af landskassen.

§ 3. Denne lov træder straks i kraft.

*Viðmerkingar:*

Fólkapensjónin var hent, tá hon kom. Tað er tó eingin loyna, at fólk, ið einans hava fólkapensjónina at liva av, hava ilt við at klára

seg til lívsins uppihald. Hóast pensjónin í krónum verður hækkað av og á, so svarar hetta ikki til tann prísvøkstur, ið verið hevur seinastu árini.

Longu í 1965 var táverandi landsstýri varugt við truplu støðuna hjá pensjónistunum, og landsstýrismaðurin Karsten Hoydal legði fram lógaruppskot um at heimila landsstýrinum at seta nevnd at kanna henda spurning.

Lógaruppskotið var samtykt, men síðani hevur eingin hoyrt aftur um málið.

Var hetta mál átrokandi at fremja í 1965, so er tað munandi meira neyðugt í dag.

Sjónarmið, ið hava verið førd fram ímóti hesi skipan, eru m.a. at hon gjørdist ov tvørlig fyri arbeiðsgevararnar at umsita, tí vit hava so nógvar smáar arbeiðsgevarar í Føroyum. Hetta sama sjónarmið var ført fram, tá dagpeningsskipanin var sett í verk. M.a. av hesi orsøk var henda skipan framd uttan fígging frá arbeiðsgevarasíðu.

Í samband við, at samtíðarskattalógin nú verður sett í verk, er rímiligt at gera vart við, at møgulig eykapensjón við lutvísari fígging frá arbeiðsgevarasíðu umsitingarliga ikki elvir til stórvegis ómak saman við inngjalding av lønum til teir stovnar, ið skulu umsita nýggju skattalógina.

Harvið er tó ikki ætlað, at møguligur eykapensjónsgrunnur skal umsitast av hesum somu peningastovnum.

Sum arbeiðstilfar til framlagda lógaruppskot verður hjálagt viðmerkingarnar til tað lógaruppskot, ið lagt var fram hin 9. februar 1965. Hesar viðmerkingar lýsa til fulnar somu viðurskifti í grannalondum okkara.

1. viðgerð 28. oktober. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 21. mars 1984 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram á ting av tjóðveldisflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 28. oktober 1983 beint í sosialu nevndina.

Tjóðveldisflokkurin vísir í framløgu síni á tingmál frá 9. februar 1965, sum táverandi landsstýri legði fram. Lógaruppskotið tá var samtykt og er samsvarandi við løgtingslóg nr. 18 frá 26. apríl 1965. Hendan lóg er framvegis í gildi og er eisini einsljóðandi við lógaruppskot Tjóðveldisfloksins í hesum løgtingsmáli nr. 8/1983.

Sosiala nevndin er tí samd um í staðin fyri lógaruppskotið at seta fram hetta

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Tann nevnd, sum landsstýrið sambært løgtingslóg nr. 18 frá 26. apríl 1965 hevur heimild at seta, verður sett av nýggjum. Nevndin skal verða liðug við arbeiði sítt í seinasta lagi hin 1. januar 1985.

2. viðgerð 21. mars. Uppskotið til samtyktar frá sosialu nevndini samtykt við 20-0 atkvøðum.

---

# 9. Orlov í samband við barnsburð og adoptión

Ár 1983, mikudagin 26. oktober legði Jóannes Dalsgaard, løgtingsmaður, vegna javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum sum skjótast at leggja fyri tingið Lógaruppskot til tess at tryggja

a) Kvinnuligum løntakarum í minsta lagi 18 vika orlov við barnsburð ella við adoptión,
b) manni í minsta lagi 1 mánaða orlov, tá hann verður pápi.

II Somulciðis áleggur løgtingið landsstýrinum at samráðast við ríkisstýrið um tær broytingar í dagpeningslógini frá 1978, sum verða ein neyðturvilig fylgja av hesum uppskoti.

*Viðmerkingar:*

Í mars 1982 legði javnaðarflokkurin uppskot til løgtingslóg um orlov í samband við barnsburð og adoptión (Tingmál nr. 162/1981).

Endamálið við lógaruppskotinum var

1) **at** geva kvinnu sum løntakara treytaleysan rætt til at vera burtur frá arbeiði, orsakað av at hon er við barn, 4 vikur frá tí degi at barnsburðurin er mettur at verða og 14 vikur eftir barnsburð,
2) **at** geva pápanum rætt til orlov eitt ávíst tíðarskeið í samband við barnsburð,
3) **at** styrkja støðuna hjá børnum og foreldrum,
4) **at** javna út munin í rættindum millum ymiskar løntakarabólkar,
5) **at** javnstilla adoptiónsforeldur við onnur foreldur.

Hetta lógaruppskot Javnaðarfloksins varð felt.

Í staðin fyri lógaruppskot Javnaðarfloksins samtykti løgtingið hetta:

«Tingmál nr. 162/1981: Orlov í samband við barnsburð og adoptión verður sent landsstýrinum við áheitan um at arbeiða víðari við málinum.»

Nú er liðið hálvtannað ár síðani løgtingið gjørdi hesa samtykt. Kortini røkist einki fyri nøkrum stigi í hesum máli frá landsstýrinum.

Javnaðarflokkurin metir tí, at tað nú er upp á tíðina, at løgtingið áleggur landsstýrinum at fara til verka til tess at fáa í lag betri skipan fyri barnburðaorlov, og setir tí fram hetta uppskot til samtyktar.

1. viðgerð 28. oktober. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 5. december legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av javnaðarflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 28. oktober 1983 beint í sosialu nevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan Sundstein, Eli Nolsøe og Frederik Olsen) vísir til tingmál nr. 162/1981, hvar tingið samtykti at biðja landsstýrið arbeiða víðari við málinum um orlov í samband við barnsburð og a-

doptión. Meirilutin minnir landsstýrið á hesa samtykt.

Minnilutin (Jóannes Dalsgaard og Karin Kjølbro) tekur undir við uppskoti Javnaðarfloksins og mælir til at samtykkja tað.

2. viðgerð 8. december. Uppskotið til samtyktar I a fall við 13 - 0, I b fall við 6 - 0. Uppskotið sostatt fallið.

---

# 10. Sjúkradagpeningaskipan

Ár 1983, mikudagin 26. oktober legði Jóannes Dalsgaard, løgtingsmaður, fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Arbeiðsbólkurin, ið kannar dagpeningsskipanina, verður álagt at gera uppskot um

1. at sjúkradagpeningurin verður hækkaður upp í 90%,
2. at útrokningargrundarlagið verður broytt, so at veitingin í størri mun enn nú verður løntakarunum at bata,
3. at arbeiðsmarknaðurin kemur at luttaka í útreiðslunum av sjúkradagpeningsskipanini,
4. at sjukradagpeningur verður veittur frá fyrsta sjúkradegi.

*Viðmerkingar:*

Tann 11. november 1981 legði Javnaðarflokkurin uppskot fyri løgtingið um betri sjúkradagpeningsskipan (sí tingmál nr. 48/1981: Sjúkradagpeningsskipan).

Sjúkradagpeningsskipan).

Skotið varð upp at seta nevnd við hesum setningi: »at kanna og gera uppskot um

1. At sjúkradagpeningurin verður hækkaður
2. at útrokningargrundarlagið verður broytt, so at veitingin í størri mun enn nú verður løntakarunum at bata,
3. at arbeiðsmarknaðurin kemur at luttaka í útreiðslunum av sjúkradagpeningsskipanini,
4. at sjúkradagpeningurin verður veittur frá fyrsta sjúkradegi,
5. tiltøk, ið kunnu setast í verk til tess at gera dagpeningsfyrisitingina so effektiva, at tann, ið eigur sjúkradagpening, kemur at bíða so stutt sum møguligt.»

Burtur úr hesum máli kom henda løgtingssamtykt:

«Álagi verður landsstýrinum at seta nevnd at endurskoða sjúkradagpeningsskipanina. Nevndin skal vera liðug við sítt arbeiði áðrenn 1. juli 1982.» (Tingmál nr. 48/1981).

Tann 18. apríl 1982 skrivar landsstýrið øllum tingmonnum bræv (F.L. j. nr. 1010-12-2-1/83), har upplýst verður, at ein arbeiðsbólkur nú er settur at kanna kunngerð um dagpening nr. 51 frá 26. juni 1979.

Í sama skrivi boðar landsstýrið frá, at tað ikki er ætlan landsstýrisins (citat): «at broyta reglurnar í dagpeningslógini, so at sjúkradagpeningurin verður hækkaður, útrokningargrundarlagið broytt, arbeiðsmarknaðurin kemur at luttaka í útreiðslunum av sjúkradagpeningsskipanini ella sjúkradagpeningur verður veittur frá fyrsta sjúkradegi.»

Javnaðarflokkurin er av tí áskoðan, at henda avgerð landsstýrisins stríðir ímóti samtykt og ætlan løgtingsins í tinnmáli nr. 48/1981: Sjúkradagpeningsskipan.

Viðgerðin av málinum vísti klárt og greitt, hvørjar ábøtur verandi dagpeningsskipan tørvar.

Skriv landsstýrisins 18. apríl 1983 til tingmenn vísir líka so greitt, at landsstýrið ikki ætlar, at hesar ábøtur skulu verða gjørdar.

Tí heldur javnaðarflokkurin tað verða avgerandi neyðugt, at Føroya Løgting sum skjótast samtykkir hetta uppskotið til samtyktar.

1. viðgerð 28. oktober. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 16. mars 1984 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er lagt fram av javnaðarflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 28. oktober 1983 beint í sosialu nevndina.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan Sundstein, Eli Nolsøe og Frederik Olsen) heldur, at landsstýrið sambært skrivi sínum frá 18. apríl 1982 hevur ikki gjørt eftir tingsamtyktini í tingmáli nr. 48/1981 og átalar hetta. Eftir uppskotinum skulu øll viðurskiftini sjúkradagpeningaskipanini viðvíkjandi endurskoðast. Harvið er ikki avgjørt, hvørjar broytingar skulu samtykkjast.

Meirilutin setur tí fram av nýggjum hetta

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at seta nevnd at endurskoða sjúkradagpeningaskipanina. Nevndin skal vera liðug við arbeiði sítt áðrenn 1. januar 1985.

Minnilutin (Jóannes Dalsgaard og Karin Kjølbro) tekur undir við uppskotinum frá javnaðarflokkinum og mælir til at samtykkja tað.

Í aðru syftu tekur minnilutin tó undir við uppskoti meirilutans.

2. viðgerð 21. mars.

Framhaldandi 2. viðgerð 11. apríl. Upprunauppskotið fall við 14 ja-atkvøðum, 15 atkvøddu ikki, 3 vóru burturstaddir.

Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

| | |
|---|---|
| Ja atkvøddu: | Jnul Jacobsen, Adolf V. Hansen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Jákup Lindenskov, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen. |
| Atkvøddu ikki; | Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn |

Joensen, Hilmar Kass, Arne Ziskasen, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Jákup Lamhauge, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein.

Burturstaddir: Hans M. Joensen, Óli Breckmann, Olaf Olsen.

Uppskotið frá meiriluta í nevndini varð samtykt við 22—0 atkvøðum.

---

# 11. Skiftisreglur í samband við samtíðarskatt.

Ár 1983, fríggjadagin 28. oktober legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um skiftisreglur í samband við samtíðarskatt.**

**1. kapittul.**

**Skiftisreglur um skattskyldu.**

**1. gr.** Persónar, sum skattskyldan er fallin burtur hjá 1. apríl 1984, av tí at viðkomandi í meira enn eitt ár sambært sýnd-

**Lagtingslov om overgangsbestemmelser ved indførelse af kildeskat.**

**Kapitel 1**

**Overgangsbestemmelser om skattepligten.**

**Prg. 1.** Personer, hvis skattepligt er bortfaldet før den 1. april 1984 på grund af, at vedkommende i mere end et år ifølge fore-

um skjølum er settur í inntøkuskatt uttanlands sum búsettur har, kemur undir skattskyldu eftir 1. gr., nr. 1, í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983, um landsskatt og kommunuskatt (samtíðarskattalógin), tá hann setur búgv aftur í Føroyum. Stuttur steðgur, sum t.d. í frítíð, kemur ikki undir hesa reglu.
*2. stk.* Skattskyldan tekur hvørki við ella heldur uppat eftir reglunum í 2. kap. í samtíðarskattalógini fyrr enn 1. apríl 1984. Tó skal, tá ið reglan í 8. gr. í samtíðarskattalógini verður nýtt, verða roknað við fyrsta degi persónurin kom higar til lands.

**2. gr.** Deyðsbúgv hjá fólki, sum doyr fyri 1. apríl 1984 koma hvørki undir 1. gr., nr. 7 ella 2. gr., nr. 1 í samtíðarskattalógini, men verða viðgjørd eftir higartil galdandi reglum. Doyr ein persónur, sum hevur sitið í óskiftum búgv, 1. apríl 1984 ella seinni, kemur búgvið undir skattskyldu eftir reglunum í samtíðarskattalógini.
*2. stk.* Verður óskift búgv kravt skift fyri 1. apríl 1984, og eftirsitandi hjúnafelagi enn er á lívi, eru reglurnar í 13—20 gr. í samtíðarskattalógini ikki galdandi.

vist dokumentation har været undergivet indkomstskattepligt i udlandet, som gældende for derboende personer, bliver først skattepligtige efter prg. 1, nr. 1, i lagtingslov nr. 86 af 1. sept. 1983 om landsskat og kommuneskat (kildeskatteloven) når disse igen tager ophold på Færøerne. Der bortses i denne forbindelse fra kortvarige ophold som ferie o.l.
*Stk. 2.* Indtræden eller ophør af skattepligt efter relerne i kap. 2 i kildeskatteloven sker tidligst fra 1. april 1984. Dog skal man, når bestemmelsen i prg. 8 i kildeskatteloven tages i anvendelse, regne med den første dag personen tog ophold her i landet.

**Prg. 2.** Dødsboer efter personer, som dør inden 1. april 1984, omfattes hverken af prg. 1, nr. 7 eller prg. 2, nr. 1 i kildeskatteloven, men behandles efter hidtil gældende regler. Dør en person, som hensidder i uskiftet bo den 1. april 1984 eller senere, er boet som helhed skattepligtigt efter kildeskatteloven.
*Stk. 2.* Fremsættes der begæring om skifte af et uskiftet bo i en længstlevende ægtefælles levende live inden 1. april 1984 gælder prg. 13—20 i kildeskatteloven ikke.

## 2. kapittul.

**Skiftisreglur um uppgerð av skattskyldugari inntøku og um útrokningina av skattinum.**

**3. gr.** Reglurnar í 3. og 10. kap. í samtíðarskattaslógini, um hvussu skattskyldug inntøka verður gjørd upp og um innlating av sjálvuppgávu v.m., verða fyrstu ferð nýttar fyri inntøkuárið 1984.

*2. stk.* Fyri inntøkuárið 1984, verður fyribils skattskylduga inntøkan gjørd upp soleiðis:

a) Inntøkan fyri tíðarskeiðið frá 1. apríl til 31. december 1984 verður gjørd upp eftir reglunum í samtíðarskattalógini, og roknað um soleiðis, at hon svarar til eina ársinntøku. Frá ársinntøkuni verða drignir allir frádráttir fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. december 1984, sum eru loyvdir eftir reglunum í samtíðarskattalógini.

b) Allar skattskyldugar inntøkur, sum eru funnar eftir hesum reglum, verða álagdar skatt til landskassan eftir reglunum í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan og kommunu- og kirkjuskatt eftir reglunum í lógini um samtíðarskatt. 75% av tí soleiðis útroknaða skattinum verður kravdur inn av Føroya Gjaldstovu sambært reglurnar í 6. kap. í samtíðarskattalógini.

## Kapitel 2

**Overgangsbestemmelser om opgørelse af den skattepligtige indkomst og beregning af skatten.**

**Prg. 3.** Reglerne i kap. 3 og kap. 10 i kildeskatteloven, om opgørelsen af skattepligtig indkomst og indlevering af selvangivelse m.v. anvendes første gang for indkomståret 1984.

*Stk. 2.* Før indkomståret 1984, opgøres den foreløbige skattepligtige indkomst således:

a) Indkomsten i perioden fra 1. april til 31. december 1984 opgøres efter reglerne i kildeskatteloven og omregnes således, at den svarer til en årsindkomst. Alle fradrag for perioden 1. januar til 31. december, som er tilladt efter kildeskatteloven, fratrækkes årsindkomsten.

b) Alle skattepligtige indkomster, som er fundet efter disse regler, pålægges skat til landskassen efter bestemmelserne i lagtingslov nr. 87 af 1. sept. 1983 om udskrivning af skat til landskassen og kommune- og kirkeskatt efter bestemmelserne i kildeskatteloven. 75% af den således beregnede skat opkræves af Føroya Gjaldstova iflg. bestemmelserne i kap. 6 i kildeskatteloven.

c) Når slutskatten for indkomståret 1984 pålignes den skattepligtige efter bestemmelserne i

c) Tá endaligi skatturin fyri inntøkuárið 1984 verður álíknaður skattskylduga eftir reglunum í samtíðarskattalógini, verður roknað við samlaðum inntøkum og frádráttum í álmanakkaárinum sambært samtíðarskattalógina, og 72% av tí tá útroknaða skattinum verður kravdur inn av Føroya Gjaldstovu eftir reglunum í 6. kap. í lógini um samtíðarskatt.

*3. stk.* Persónar, sum koma undir skattskyldu eftir 1. gr. í samtíðarskattalógini, og sum í skattaárinum 1983/84 hava verið stytri enn eitt ár uttanlands, og sum hava goldið skatt har av inntøku haðani, kunnu draga henda skatt frá í tí inntøkuskatti, sum latin verður í Føroyum fyri skattaárið 1983/84. Frádrigið kann tó ikki verða meira enn tann í Føroyum álíknaði skattur fyri skattaárið 1983/84. Í slíkum førum skal inntøka vunnin uttanlands takast við í endaligu álíkningini í Føroyum í tí ári, hon er vunnin.

kildeskatteloven, skal man medtage de samlede indtægter og samlede fradrag for hele kalenderåret iflg. kildeskatteloven, og 72% af den således beregnede skat opkræves af Føroya Gjaldstovu iflg. bestemmelserne i kap. 6. i kildeskatteloven.

*3. stk.* Personer, som bliver skattepligtige efter bestemmelserne i prg. 1 i kildeskatteloven, og som i skatteåret 1983/84 har opholdt sig mindre end et år i udlandet, og som har betalt skat der af indkomst indvundet der, kan fratrække denne skat i den indkomstskat, der skal betales til Færøerne for skatteåret 1983/84. Der kan ikke fratrækkes mere end den på Færøerne pålignede skat for skatteåret 1983/84. I disse tilfælde skal den indkomst, der er indtjent i udlandet tages med i slutligningen på Færøerne i det år, denne er indtjent.

## 3. kapittul.

## Skiftisreglur um innkrevjing av skatti og reglur um skuldbinding, innheinting o.a.

**4. gr.** Reglurnar um skattaútrokning og -innheinting v.m. í 6. kap. í samtíðarskattalógini

## Kapitel 3.

## Overgangsbestemmelser om opkrævning af indkomstskat og regler om hæftelse og inddrivelse m.v.

**Prg. 4.** Reglerne om skatteberegning og opkrævning m. v. i kap. 6 i kildeskatteloven anven-

verða fyrstu ferð nýttar, tá skattur skal leggjast á fyri inntøkuárið 1984. Tað sama er galdandi fyri skuldbindingar- og innheintingarreglurnar í 13. kap. og revsireglurnar í 14. kap. Reglurnar í 136. gr. í samtíðarskattalógini verða eisini nýttar aftaná 1. apríl 1984, tá skattur, ið er álíknaður fyri skattaárið 1983/84 og eldri skattaár, verður innheintaður.

**5. gr.** Reglurnar í gr. 1 og 2. stk. í samtíðarskattalógini, um eftirhald í vinningsbýti av partabrøvum v.m. verða nýttar bæði fyri vinningsbýti, sum er latið fyri og aftaná 1. apríl 1984.

**6. gr.** Reglurnar í 67. og 125. gr. í samtíðarskattalógini um skrár yvir ávikavist skattskyldugar og ávísingarskyldugar, sum landsstýrið ger í samráð við líkningarráðið, kunnu nýtast fyri 1. apríl 1984.

## 4. kapittul.

## Skattur av fluttari inntøku.

**7. gr.** Allir persónligir skattgjaldarar verða fyri inntøkuárið 1983 settir í skatt av inntøku, sum er flutt til hetta árið orsakað av broyting í mannagongdini við inntøkuuppgerðini í mun til

des første gang ved beskatning af indkomsten for indkomståret 1984. Det samme gælder hæftelses- og inddrivelsesbestemmelserne i kildeskattelovens kap. 13, og straffebestemmelserne i kap. 14. Reglerne i kildeskattelovens prg. 136 anvendes også ved inddrivelse efter den 1. april 1984 af skatter pålignet for skatteåret 1983/84 og tidligere skatteår.

**Prg. 5** Bestemmelserne i prg. 30, stk. 1 og 2 i kildeskatteloven om indeholdelse i aktieudbytte m.v. anvendes både for udbytte, som er erhvervet før og efter 1. april 1984.

**Prg. 6.** Reglerne i kildeskattelovens prg. 67 og prg. 125 om registre over henholdsvis skattepligtige og anvisningspligtige, som oprettes i samråd mellem landsstyret og ligningsrådet kan bringes i anvendelse inden 1. april 1984.

## Kapitel 4.

## Beskatning af overført indkomst.

**Prg. 7.** Personer svarer for indkomståret 1983 skat af indkomst, som er overført til dette år ved ændring af fremgangsmåden ved indkomstopgørelsen i forhold til 1982, da den skattepligtige ind

1982, tá skattskyldug inntøka fyri 1983 verður gjørd upp. Hetta er eisini galdandi viðvíkjandi fluttari inntøku sum stendst av broyting av øðrum fyriskipanum, sum hava samband við roknskaparførsluna ella inntøkuuppgerðina, eitt nú minking av avskrivingum og broyting í uppgerðarháttinum av vørugoymsluni o.t.

*2. stk.* Reglan í 1. stk. um skatting av fluttari inntøku er eisini galdandi fyri inntøku, sum er flutt til inntøkuárið 1983 við útgjalding av løn, tantieme o.l. frá felǿgum v.m., sum eru undir partafelagsskatting, út um tað, sum higartil eftir partafelagsins viðurskiftum hevur verið vanligt.

*3. stk.* Bert tann parturin av fluttari inntøku, sum er størri enn kr. 25.000 verður álagdur skatt til landskassa og kommunukassa við 50%. Skatturin verður býttur javnt millum landskassa og avvarðandi kommunu.

komst for 1983 bliver opgjort. Dette er også gældende for over ført indkomst som fremkommer ved ændring i andre foranstaltninger knyttet til regnskabsførelsen eller indkomstopgørelsen, f. eks. formindskelse af afskrivninger og ændring i opgørelsesmåden af varelagre m.v.

*Stk. 2.* Beskatning som anført i stk. 1 finder også sted af indkomst, der er overført til indkomståret 1983 ved udbetaling af løn, tantieme og lignende fra aktieselskaber m.v. undergivet selskabsbeskatning ud over, hvad der efter selskabets hidtidige forhold må anses for det normale.

*Stk. 3.* Kun del del af overført indkomst, som overstiger kr. 25.000 pålægges skat til lands- og kommunekassen med 50%. Skatten deles med halvdelen til landskassen og halvdelen til kommunekassen.

**8. gr.** Somu reglur, sum eru galdandi fyri uppgerð av skattskyldugari inntøku fyri skattaárið 1983/84, eru annars eisini galdandi, tá inntøkan fyri inntøkuárið 1983 skal gerast upp, bert broyttar við teimum fyriskipanum, sum henda lóg ásetur.

**Prg. 8.** Iøvrigt anvendes de samme regler som anvendes ved opgørelse af skattepligtig indkomst for skatteåret 1983/84, når indkomsten for skatteåret 1983 skal opgøres, kun ændret ved de bestemmelser som fastsættes i denne lov.

**9. gr.** Skattur av fluttari inn-

**Prg. 9.** Skatten af overført ind-

tøku fellur til gjaldingar við einum triðingi av upphæddini hin 1. í hvørjum av mánaðunum september, oktober og november 1984 við gjaldfreist til 20. í mánaðanum. Er seinasti gjaldsdagur ein heilidagur ella ein leygardagur, verður gjaldfreistin framlongd til næsta gerandisdag. Reglurnar um rentu og innheinting av skatti sambært 136. gr. í samtíðarskattalógini eru annars galdandi.

## 5. kapittul.

## Skatting av meirinntøku.

**10. gr.** Allir persónar sum 1. apríl 1984 eru sjalvstøðugt skattskyldugir her í landinum sambært 1. gr., nr. 1 ella nr. 2 ella 2. gr., 1. stk., litra d, e ella f í samtíðarskattalógini, lata fyri inntøkuárið 1983 skatt av meirinntøku gjørd upp eftir reglunum í 12. — 14. gr.

*2. stk.* Harumframt skal meirinntøka verða skattað hjá:

1) Kvinnu, sum hevur fingið fullan hjúnaskilnað ella er sundurlisin í tíðini frá 1. apríl til 31. december 1984, og sum tí kemur undir sjálvstøðuga skattskyldu eftir einari av teimum í 1. stk. nevndu reglum í samtíðarskattalógini, og hvørs inntøka ikki verður tikin við eftir 14. gr., 1.

komst forfalder til betaling med en trediedel af beløbet den 1. i hver af månederne september, oktober og november 1984, med sidste rettidige indbetalingsdag den 20. i forfaldsmåneden. Falder sidste rettidige betalingsdag på en helligdag eller en lørdag, forlænges fristen til den følgende hverdag. Iøvrigt anvendes de regler, som i henhold til prg. 138 i kildeskatteloven, gælder med hensyn til forrentning og inddrivelse af skatten.

## kapitel 5.

## Beskatning af overskydende indkomst.

**Prg. 10.** Personer, der den 1. april 1984 er selvstændigt skattepligtige her i landet efter prg. 1, nr. 1 eller nr. 2, eller prg. 2, stk. 1 litra d, e eller f i kildeskatteloven svarer for indkomståret 1983 skat af overskydende indkomst opgjort efter reglerne i prg. 12-14.

*Stk. 2.* Skat af overskydende indkomst skal endvidere svares af:

1) Kvinder der ved skilsmisse eller separation i tiden fra den 1. april til den 31. december 1984 bliver selvstændigt skattepligtige efter en af de i stk. 1 nævnte bestemmelser i kildeskatteloven, og hvis indkomst iflg. prg. 14, stk. 1, ikke medregnes ved be-

.. tá ið skatturin av meirinntøkuni hjá hjúnafelaga verður ásettur.
2) Kvinnu, sum í inntøkuárinum 1982 ella 1983 er sett í skatt saman við hjúnafelagnum, men hvørs inntøka eftir 14. gr., 1. stk. 2. okt. ikki er tikin við í útrokningini av meirinntøkuni hjá hjúnafelagnum.
*3. stk.* Skattur av meirinntøku verður ikki roknaður hjá:
1) Persónum, sum við flyting til Føroyar eru komnir undir skatt skyldu aftaná 1. juli 1982.
2) Persónum, sum doyggja innan árslok 1984, og
3) Einkjum, sum eru komnar undir sjálvstøðuga skattskyldu aftaná 1. januar 1983.

**11. gr.** Kvinna, sum aftaná giftu er sett í skatt sambært 20. gr., 2. stk. í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum, verður framvegis undir hesi reglu, so leingi 2 ár ikki eru farin frá tí, hon varð sett í skatt eftir hesi reglu.

**12. gr.** Sum meirinntøka er at rokna upphædd, sum skattskylduga inntøkan fyri inntøkuárið 1983 er omanfyri javnmetingarinntøkuna. Tann parturin av fluttari inntøku, sum er 25.000 kr. ella minni, og sum ikki er skattaður eftir 4. kap., verður taldur við tá meirinntøka

regningen af ægtefællens overskydende indkomst.
2) Kvinder, der sambeskattes med deres ægtefælle for indkomståret 1982 eller 1983, men hvis indkomst iflg. prg. 14, stk. 1, ikke medregnes ved beregningen af ægtefællens overskydende indkomst.
*Stk. 3.* Skat af overskydende indkomst svares ikke af;
1) Personer, hvis skattepligt er indtrådt efter den 1. juli 1982 ved tilflytning til Færøerne,
2) personer, der er afgået ved døden inden udgangen af året 1984 samt
3) Enker, hvis selvstændige skattepligt er indtrådt efter den 1. januar 1983.

**Prg. 11.** En kvinde, som efter at have indgået ægteskab, er ansat til skat iflg. prg. 20, stk. 2 i lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 med senere ændringer, er fremdeles undergivet denne bestemmelse, indtil 2 år er gået fra det tidspunkt, hun blev ansat i skat efter denne regel.

**Prg. 12.** Som overskydende indkomst regnes det beløb hvormed den skattepligtige indkomst for indkomståret 1983, overstiger sammenligningsindkomsten. Den del af overført indkomst, som er kr. 25.000 eller derunder, og som ikke er beskattet efter kap. 4 skal medregnes, når over-

verður uppgjørd.
*2. stk.* Javnmetingarinntøkan er ásetta skattskylduga inntøkan í inntøkuárinum 1984 hækkað við 30.000 kr. fyri leys og 50.000 kr. fyri hjún. Skattskyldugur persónur kann krevja, at javnmetingarinntøkan ístaðin verður roknað eftir skattskyldugari inntøku fyri inntøkuárið 1982. Líkningarvaldið kannar tá, hvat av árunum 1982 ella 1984 er til hansara fyrimun, og velur tað árið, til javnmetingarár. Um so er, at ásetingin av inntøkuni ikki er fyri alt árið, verður hon roknað um áðrenn hækking soleiðis, at hon svarar til eina ársinntøku.

skydende indkomst opgøres.
*Stk. 2.* Sammenligningsindkomsten er den ansattes skattepligtige indkomst for indkomståret 1984, forhøjet med 30.000 for enlige og kr. 50.000 for ægtefæller. Den skattepligtige kan kræve, at sammenligningsindkomsten i stedet beregnes på grundlag af den skattepligtige indkomst for indkomståret 1982. Ligningsmyndighederne undersøger, hvilket af årene 1982 eller 1984 er til hans fordel, og vælger dernæst det år, han skal sammenlignes med. Vedrører indkomstansættelsen ikke hele året, omregnes den inden forhøjelsen således, at den svarer til et helt års indkomst.

**13. gr.** Er kona hins skattskyldugu sett í skatt fyri seg eftir reglunum í 17. gr. 2. stk. í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum, verður inntøka hennara løgd afturat ásettu inntøku hansara, áðrenn javnmetingarinntøkan verður roknað.
*2. stk.* Eru hjún gift í tíðarskeiðinum 1. januar til 31. mars 1984, verður inntøkan hjá konuni eisini løgd afturat inntøku mansins, áðrenn javnmetingarinntøkan verður roknað, jmt. tó 11. gr.

**Prg. 13.** Er den skattepligtiges hustru ansat særskilt til skat efter bestemmelserne i prg. 17, stk. 2 i lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer, lægges dennes særskilte ansatte indkomst til hans indkomst, forinden sammenligningsindkomsten beregnes.
*Stk. 2.* Er ægtefællerne blevet gift i tiden fra den 1. januar til den 31. marts 1984, lægges hustruens indkomst også sammen med mandens indkomst før sammenligningsindkomsten beregnes, jfr. dog prg. 11.

**14. gr.** Er ein skattskyldugur persónur ikki skattaður sum gift-

**Prg. 14.** Er den skattepligtige ikke beskattet som gift pr. 1.

ur 1. apríl 1984, ella hevur hann bert verið giftur ein part av tíðini frá 1. apríl til 31. december 1984, verður inntøkan hjá hjúnafelagnum ikki tald við í uppgerðini av meirinntøkuni, men skal meirinntøkan tá verða gjørd upp fyri hvønn sær. Sama er galdandi, tá ið inntøkan í inntøkuárinum 1982 verður nýtt sum grundarlag undir uppgerðini av javnmetingarinntøkuni, og skattskyldugi bert fyri annað av inntøkuárunum 1982 og 1983 er skattaður sum giftur.

*2. stk.* Um so er, at inntøka skal verða býtt sundur sambært 1. stk., verða frádráttirnir, sum ikki standast av at vinna inntøkuna, býttir sundur millum hjúnarfelagarnar í lutfalli við inntøkurnar.

**15. gr.** Skatturin av meirinntøku verður uppkravdur við 40%. Áðrenn verður inntøkan javnað niður til fyrsta krónutal, ið kann býtast við 100.

*2. stk.* Skatturin fellur til gjaldingar við einum triðingi av upphæddini hin 1. í hvørjum av mánaðunum september, oktober og november 1985 við gjaldsfreist til 20. í mánðanum. Er seinasti gjaldsdagur ein heilidagur ella ein leygardagur, verður gjaldfreistin framlongd til næsta gerandisdag. Fellur skattaskyldan burtur við andlát ella flyting í tíðarskeið-

april 1984, eller har han kun været gift en del af tiden fra den 1. april til 31. december 1984 medregnes ægtefællens indkomst ikke ved opgørelsen af overskydende indkomst. Det samme gælder, når indkomsten i indkomståret 1982 anvendes som grundlag for opgørelsen af sammenligningsindkomsten og den skattepligtige for kun det ene af indkomstårene 1982 og 1983 er indkomstbeskattet med ægtefællen.

*Stk. 2* Skal der som følge af stk. 1 ske opdeling af sambeskattet indkomst, fordeles de fradrag, der ikke vedrører indkomsterhvervelsen, mellem skatteyderen og ægtefællen efter forholdet mellem deres indkomster.

**Prg. 15.** Skatten af overskydende indkomst beregnes med 40%. Forinden beregningen afrundes indkomsten nedad til det nærmeste kronebeløb, der kan deles med 100.

*Stk. 2.* Skatten forfalder til betaling med en trediedel af beløbet den 1. i hver af månederne september, oktober og november 1985 med sidste rettidige betalingsdag den 20. i forfaldsmåneden. Falder sidste rettidige betalingsdag på en helligdag eller en lørdag, forlænges fristen til den følgende hverdag. Ophører skattepligten ved død

inum 1. apríl til 31. oktober 1985, fellur skatturin ella restin av honum til gjaldingar beinanveg. Er skatturin av meirinntøku minni enn 500 kr. verður hann ikki kravdur inn. Annars galda reglurnar í 136 gr. í samtíðarskattalógini, tá meirskattur verður innheintaður.

**16. gr.** 40% av skattinum av meirinntøkuni verður latin til ta kommunu, har hin skattskyldugi skal setast í inntøkuskatt fyri inntøkuárið 1984.
*2. stk.* Tap, sum stendst av eini møguligari lækking av skattinum ella av, at ein partur av skattinum ikki fæst inn, verður býtt lutfalsliga millum landskassan og kommununa.

**17. gr.** Inntøkuførd avskriving sambært regluna í lóg nr. 52 frá 29. december 1971 um skattligar avskrivingar v.m. verður ikki tikin við í uppgerðini av skattskyldugari inntøku fyri 1983, men verður í staðin áløgd eitt serstakt avgjald uppá 50%. Tó kann eitt møguligt hall í skattauppgerðini fyri 1983 mótroknast í inntøkuførdum avskrivingum. Avgjaldið, sum fellur til gjaldingar sambært reglurnar í 9. gr. verður býtt millum landskassan og ta kommunu, sum hin skattskyldugi er skattskyldugur í fyri

eller fraflytning i tiden fra den 31. oktober 1985, forfalder den eller de resterende rater til betaling straks. Udgør skatten af overskydende indkomst mindre end 500 kr. opkræves den ikke. Iøvrigt gælder reglerne i prg. 136 i kildeskatteloven med hensyn til inddrivelse af overskydende skat.

**Prg. 16.** 40% af skatten af overskydende indkomst tilfalder den kommune, i hvilken den skattepligtige skal ansættes til indkomstskat for indkomståret 1984.
*Stk. 2.* Et tab, ved en eventuel nedsættelse af skatten eller ved delvis uerholdelighed, fordeles forholdsmæssigt på de landsskatten og kommunen tilfaldende andele af skatten.

**Prg. 17.** Genvundne afskrivninger i henhold til bestemmelsen, i lov nr. 52 af 29. december 1971 om skattemæssige afskrivninger m.v., om almindelig indkomstbeskatning af genvundne afskrivninger, medtages ikke i den skattepligtige indkomst for indkomståret 1983, men pålægges i stedet en særskilt afgift på 50%. Dog kan et muligt tab i skatteopgørelsen for 1983 modregnes i genvundne afskrivninger. Afgiften, som forfalder til betaling i henhold til bestemmelserne i prg. 9, forde-

inntøkuárið 1984 við ávikavist 60% og 40%. Annars galda reglurnar í 136. gr. í løgtingslóg um samtíðarskatt um innheinting v.m.

les mellem landskassen og den kommune, som den skattepligtige er skattepligtig til for indkomståret 1984 med henholdsvis 60% og 40%. Iøvrigt gælder reglerne i prg. 136 i kildeskatteloven hvad inddrivelse m.v. af skatten angår.

**18. gr.** Persónur, sum hevur verið fyri tapi, sum sambært 9. gr., 5) í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 kann verða drigið frá inntøkuni í 1983, avger sjálvur, um hetta tap ella partur av tí skal verða drigið frá inntøkuni í 1983 ella 1984. Um so er, at skatttauppgerðin tá vísir hall, kann hetta verða drigið frá eftir reglunum í 33. gr., 6) í samtíðarskattalógini.

**Prg. 18.** en person, der har været udsat for tab, som ifølge prg. 9, 5) i lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 kan fratrækkes indkomsten i 1983, bestemmer selv, hvorvidt dette tab helt eller delvis skal fratrækkes indkomsten i 1983 eller 1984. Såfremt skatteopgørelsen herefter viser underskud, kan det resterende underskud fradrages efter reglerne i prg. 33, 6) i kildeskatteloven.

## 6. kapittul.

## Skiftisreglur fyri feløg v.m.

## Kapitel 6.

## Overgangsregler for selskaber m.v.

**19. gr.** Fyri tey feløg v.m., sum eru skattskyldug eftir reglunum í 1. gr. nr. 11) — 13) í samtíðarskattalógini galda tær í 2. — 5. stk. nevndu skiftisreglur. Tað skattaár, sum hesi feløg fyrstu ferð eru sett í skatt í eftir reglunum í hesi lóg, verður nevnt skiftisskattaárið.

*2. stk.* Skattskyldugu inntøkan í tí roknskaparári, sum fellur saman við ella endar í álmanakkaárinum 1984, er skatt-

**Prg. 19** For de selskaber m.v. som er skattepligtige efter reglerne i prg. 1, nr, 11) - 13) i kildeskatteloven gælder de i stk. 2-5 omtalte overgangsbestemmelser. Det skatteår, som disse selskaber første gang beskattes i efter bestemmelserne i denne lov, benævnes overgangsskatteåret.

*Stk. 2.* Den skattepligtige indkomst i det regnskabsår, som falder samtnen med eller slutter i kalenderåret 1984, er den skat-

skylduga inntøkan í skiftisskattaárinum. Roknskaparárið umfatar 12 mánaðar og gongur frá endanum av tí tíðarskeiði, sum seinasti almenni roknskapur, áðrenn hendа lóg fær gildi, var gjørdur fyri.

*3. stk.* Í skiftisskattaárinum verða maskinur, innbúgv, innleggingar og innrættingar og tílík rakstrargøgn, sum felagið eigur við inntøkuársins byrjan roknað við í saldovirðið, jmt. løgtingslóg nr. 52 frá 29. desember 1971 um skattligar avskrivingar v.m. (avskrivingarlógin), við tí saldovirði, sum gjørt er upp í seinasta almenna roknskapinum áðrenn skiftisskattaárið. Afturat hesi upphædd verður lagdur útveganarkostnaður fyri rakstrargøgn fingin í inntøkuárinum og drigið frá søluvirðið av rakstrargøgnum, sum seld eru í inntøkuárinum, smb. avskrivingarlógina. Útreiðslur til umbøtan av rakstrargøgnum fáa somu viðgerð sum útreiðslur til nýútveganir. Harumframt verður lagdur afturat, tann partur av gjørdum avskrivingum, sum fer upp um hægst loyvdu skattligu avskrivingar seinastu 5 árini áðrenn skiftisskattaárið. Av soleiðis útroknaða saldovirðinum kann avskriving verða gjørd sambært reglurnar í avskrivingarlógini.

*4. stk.* Tá eitt møguligt tap av rakstrargøgnum, sum eru útskattepligtige indkomst i overgangsskatteåret. Regnskabsåret omfatter 12 måneder og strækker sig fra afslutningen af den periode, som sidste offentlige regnskab, før denne lov trådte i kraft, omfattede.

*Stk. 3.* For overgangsskatteåret indgår maskiner, inventar, installationer og indretninger og lignende driftsmidler, som selskabet ejer ved indkomstårets begyndelse i saldoværdien, jfr. lagtingslov nr. 52 af 29. december 1971 om skattemæssige afskrivninger m.v. (afskrivningsloven), med den saldoværdi, hvortil de er ansat i det senest offentliggjorte regnskab forud for overgangsskatteåret. Dette beløb forhøjes med anskaffelsessummen, for driftsmidler, der er anskaffet i indkomståret, og nedsættes med beløb, der i samme tidsrum er indvundet ved afståelse af driftsmidler iflg. afskrivningsloven. Udgifter til forbedringer af driftsmidler behandles på samme måde som anskaffelsessummer. Deuden forhøjes saldoværdien med den del af de foretagne afskrivninger, der overstiger de højst tilladte skattemæssige afskrivninger i de sidste 5 år inden overgangsskatteåret. På den således beregnede saldoværdi kan skattemæssige afskrivninger foretages efter reglerne i afskrivningsloven.

*Stk. 4* Ved opgørelsen af et i af-

vegað í roknskaparárinum fyri skiftisskattaarið, skal gerast upp sambært 4. gr. 1. stk. í avskrivingarlógini, skal verða roknað við tí virði, sum er tikið við í saldovirðinum smb. 3. stk.

*5. stk.* Bygningar, sum kunnu avskrivast sambært 4. kap. í avskrivingarlógini, og sum eru keyptir ella liðugt bygdir í árunum frammanundan skiftisskattaárinum, kunnu í skiftisskattaárinum og árini aftaná verða avskrivaðir við keyp-/-byggivirðinum sum grundarlag. Samlaðu avskrivingarnar kunnu tó hægst verða ájavnar við keyps-/-byggivirðið aftaná vanligar skattligar avskrivingar, ið kundu verið gjørdar av bygningunum í ognartíðini, eru frádrignar.

## 7. kapittul.

## Onnur fyrimæli.

**20. gr.** Skattskyldugir persónar lata inn sjálvuppgávu og ognaruppgerð fyri inntøkuárið 1983, og skattskyldug inntøka verður gjørd upp eftir reglunum fyri skattaárið 1983/84. Skattskyldugir skulu eftir avgerð landsstýrisins geva teir upplýsingar, sum eru neyðugir fyri álíkningina av skatti av fluttari inntøku og meirinntøku. Reglurnar um hvørjar upplýsingar kunnu krevjast, tá sjálvuppgávan verður

skrivningsloven prg. 4, stk. 1 omhandlet tab på driftsmidler, som er anskaffet i regnskabsåret forud for overgangsskatteåret, anvendes den værdi, som er taget med i saldoværdien iflg. stk. 3.

*Stk. 5.* På bygninger, hvorpå der kan afskrives i overensstemmelse med reglerne i kap. 4 i afskrivningsloven, og som er købte eller fuldførte i årene forud for overgangsskatteåret, kan der i overgangsskatteåret og følgende skatteår afskrives på grundlag af købs-/byggeværdien. De samlede afskrivninger kan dog højst være lig med købs-/byggeværdien efter fradrag af normale skatlige afskrivninger, som man kunne have gjort siden anskaffelses-/byggeåret.

## Kapitel 7.

## Andre bestemmelser.

**Prg. 20.** Skattepligtige personer indgiver selvangivelse og formueopgørelse for indkomståret 1983, og der foretages ansættelse af den skattepligtige indkomst efter regler, som var gældende for skatteåret 1983/84. De skattepligtige skal efter landsstyrets nærmere bestemmelser give de oplysninger, der er nødvendige for påligningen af skat af overført eller overskydende indkomst. Om afgivelsen af disse

latin inn, eru annars eisini galdandi her. Álíkning av fluttari inntøku verður gjørd sambært teimum reglum, sum eru galdandi fyri endaliga álíkning, herundir kæru til landsskattanevndina. Álíkning av fluttari inntøku verður gjørd í tí kommunu, har hin skattskyldugi skal setast í inntøkuskatt fyri inntøkuárið 1984.

**21. gr.** Roknaður frítíðarpeningur fyri inntøkuárið 1983 skal ikki takast við í skattskyldugu inntøkuni fyri hetta árið, men verður í staðin tikin við, tá hann kemur til útgjaldingar í 1984.

**22. gr.** Bygda(r)ráðini skulu í seinasta lagi 1. februar 1984 áseta kommunu- og kirkjuskattaprosentini og barnafrádráttin í kommunuskattinum, sum galdandi fyri inntøkuárið 1984. Um hesi tá ikki eru ásett, kann landsstýrið áseta tey.

**23. gr.** Landsstýrið ásetur tær reglur, sum eru neyðugar fyri, at henda lóg kann verða framd.

**24. gr.** Henda lóg fær gildi beinanveg.

oplysninger finder reglerne om selvangivelse tilsvarende anvendelse. Ansættelse af overført og overskydende indkomst sker efter de regler, der er gældende for slutligningen herunder om klage til landsskattenævnet. Ansættelse af overskydende indkomst foretages i den kommune, i hvilken den skattepligtige skal ansættes til indkomstskat for indkomståret 1984.

**Prg. 21.** Beregnede feriepenge for indkomståret 1983, skal ikke medtages i den skattepligtige indkomst for dette år, men medtages i stedet for i udbetalingsåret 1984.

**Prgr. 22.** Bygderådene skal senest 1. februar 1984 fastsætte kommune- og kirkeskatteprosenten og børnefradraget i kommuneskatten, gældende for indkomståret 1984. Hvis disse ikke er fastsat til tiden, kan landsstyret gøre det.

**Prg. 23.** Landsstyret fastsætter de nærmere regler, der er nødvendige til lovens gennemførelse.

**Prg. 24.** Denne lov træder i kraft straks.

*Viðmerkingar til lógaruppskotið.*
Nú farið verður yvir til samtíðarskatt, verður neyðugt at gera ávísar skiftisreglur fyri árið 1983, sum verður hitt seinasta undir núgaldandi skattalóg.

Høvuðsinnihaldið í hesum skiftisreglum er innihaldið í tí uppskoti til samtyktar um umlegging av skattaskipanini til samtíðarskatt, sum tingið samtykti í seinastu tingsetu, samb. tingmál nr. 42/1982.

*Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar.*

Skattur, sum verður goldin sambært lógina um samtíðarskatt, verður roknaður av inntøkuni í sjálvari gjaldstíðini. Tann persónligi skatturin, sum fellur til gjaldingar í 1. fjórðingsári av 1984, er skattur, sum er álíknaður fyri skattaárið 1983/84 av inntøkuni í 1982. Hetta kemur at bera í sær, at persónliga inntøkan í inntøkuárinum 1983 ikki kemur at verða løgd til grund fyri álíkningini í skattaárinum 1984/85. Neyðugt verður tó at lata inn vanliga sjálvuppgávu yvir inntøkuna í 1983, og at gera eina álíkning fyri inntøkuárið 1983, fyri at kunna nýta lógina um skiftisreglur.

**1 gr.** Reglurnar um skattskyldu sambært lógina um samtíðarskatt eiga at verða nýttar frá tí lógin fær gildi, sjálvt um tann tilburður, sum hevur ført til skattskyldu, ella at skattskylda er hildin uppat her í landinum, stavar frá tíðini fyri lógin kom í gildi. Hóast hetta verður høvuðsreglan, so kann tó koma fyri, at hon gevur órímilig úrslit.

Sambært galdandi reglur fellur skattskyldan burtur hjá einum persóni, um viðkomandi sambært sýndum skjølum hevur verið settur í skatt uttanlands meira enn eitt ár, sum búsettur har.

Í slíkum førum sum hesum kann koma fyri, at skattskyldan sambært 1. gr. í lógini um samtíðarskatt kann standa við her í landinum, tí fasti bústaðurin er í Føroyum. Tað verður ikki hildið rímuligt at lata hesa reglu verða galdandi fyri persónar, sum hava verið settir í skatt uttanlands meira enn eitt ár fyri 1. apríl 1984. Um hetta undantak ikki verður gjørt, kann lógin um samtíðarskatt í vissum førum bera í sær, at hesir persónar koma undir skattskyldu.

Tá slíkir persónar aftaná 1. apríl 1984 taka bústað aftur her í landinum, tekur skattskyldan við aftur. Stuttur steðgur, sum t.d. í frítíð, kemur ikki undir hesa reglu, sjálvt um ein persónur ikki fyrr enn aftaná 1. apríl 1984 kann prógva, at hann hevur verið settur í skatt uttanlands í eitt ár ella meira, má skattskyldan her í landinum sambært núverandi praksis metast at verða burturdottin frá fyrsta degi viðkomandi er settur í skatt uttanlands, og skattskyldan vil heldur ikki í hesum føri taka við aftur í Føroyum, sambært 1. gr. nr. 1 í løgtingslóg um samtíðarskatt, fyrr enn viðkomandi aftur tekur bústað her í landinum.

*2. stk.* Sambært 160. gr. í løgtingslóg um samtíðarskatt, skal landsstýrið við kunngerð áseta nær lógin um samtíðarskatt fær gildi, men tá nakrar reglur í 2. kap. kunnu tulkast at galda aftur í tíðina, so verður í hesum stk. bert sligið fast, at hesar reglur ikki kunnu vera galdandi fyri tíðina, áðrenn lógin fær gildi.

Tó er eitt undantak gjørt, tá tað snýr seg um regluna í 8 gr. jmt. 1. gr. nr. 4 í lógini um samtíðarskatt. Her verður altíð roknað aftur til fyrsta dagin persónurin kom higar til lands, t.v.s. at um ein persónur ikki hevur verið í Føroyum í 90 dagar, tá lógin um samtíðarskatt fær gildi, so verður ikki bert roknað aftur til 1. apríl, tá skattskyldan skal avgerast eftir lógini um samtíðarskatt, men aftur til fyrsta dagin hann kom higar til lands.

Hetta ber í sær, at ein persónur, sum flytir til Føroyar 5. januar 1984, og verður her meira enn 180 dagar, verður fult skattskyldugur frá 5. januar at rokna. Hann skal tá gjalda skatt fyri skattaárið 1983/84 í tíðarskeiðinum 5/1 - 31/3 - 1984, og so eftir lógini um samtíðarskatt frá 1/4 - 1984, jmt. 3. gr. 2. stk.

Um nú sami persónur flytir aftur úr Føroyum 1/5 - 1984, so verður hann ikki mettur sum fult skattskyldugur, men kemur undir regluna um avmarkaða skattskyldu eftir galdandi skattalóg fyri tíðarskeiðið 5/1 - 31/3- 84, og síðani undir regluna um avmarkaða skattskyldu eftir lógini um samtíðarskatt.

*2. gr.* Her verður bert ásett, at deyðsbúgv, sum eru undir skiftisviðgerð 1. apríl 1984, verða viðgjørd eftir núgaldandi reglum. Um haraftur ímóti ein persónur, sum hevur sitið í óskiftum búgv fyri 1. apríl 1984, doyr, so skal búgvi viðgerast eftir lógini um samtíðarskatt. Sama ger seg galdandi fyri óskift búgv, sum verða kravd skift eftir 1. apríl í 1984, og har eftirsitandi hjúnafelagin enn er á lívi.

*3. gr.* Tá lógin um samtíðarskatt verður sett í gildi frá 1. apríl 1984 at rokna, ber hetta í sær, at skattur ikki verður hildin eftir í inntøkuni í 1. fjórðingsári av 1984, men verður skattur goldin sambært rokning í hesum tíðarskeiði sambært galdandi skattalóg.

Neyðugt verður tí at gera serligar reglur fyri inntøkuárið 1984 um, hvussu fyribilsskatturin skal roknast út aftaná 1. apríl 1984.

Skotið verður upp, at øll A-inntøka í tíðarskeiðinum 1. apríl til 31. december 1984 verður roknað soleiðis, at hon svarar til eina ársinntøku. Allir loyvdir frádráttir fyri 1984 verða driguir frá sambært lógina um samtíðarskatt. Skatturin verður síðani roknaður út eftir reglunum í løgtingslóg nr. 86 frá 1. sept. 1983 um áseting av skatti til landskassan og kommunuskatt eftir lógini um samtíðarskatt jmt. 22.

gr. í hesum uppskoti. 75% av hesum skattinum verða kravd inn eftir reglunum í 6. kap. í lógini um samtíðarskatt.

Tá endaligi skatturin fyri inntøkuárið 1984 verður álíknaður, skal verða roknað við allari inntøkuni og øllum frádráttum í 1984. Henda uppgerð og álíkning verður gjørd sambært reglurnar í løgtingslóg um samtíðarskatt. 72% av samlaðu árligu álíkningini fyri 1984 er skatturin fyri tíðarskeiðið 1/4 - 31/12 - 1984 og írestandi skattur verður innheintaður ella ov nógv goldin fyribilsskattur afturgoldin eftir reglunum í løgtingslóg um samtíðarskatt.

Hjá B-skattaborgarum verður inntøkan mett fyri alt árið 1984 eftir reglunum í 6. kap. í løgtingslóg um samtíðarskatt. Skatturin verður síðani roknaður út eftir reglunum í løgtingslóg nr. 86 frá 1 sept. 1983 um áseting av skatti til landskassan og kommunuskatt eftir lógini um samtíðarskatt, jmt. 22. gr. í hesum uppskoti. 75 % av hesum skattinum verða kravd inn eftir reglunum í 6. kap. í lógini um samtíðarskatt. Endaliga álíkningin fer fram eftir lógini um samtíðarskatt. 75% av endaliga árliga skattinum verður roknað sum skattur fyri tíðarskeiðið 1/4 - 31/12 - 1984, og verður hann innkravdur av Føroya Gjaldstovu sambært reglurnar í løgtingslóg um samtíðarskatt.

Tá inntøkan fyri 1. ársfjórðing 1984 skal roknast við í samlaðu ársinntøkuna fyri 1984, vil Líkningarráð Føroya við kunngerð heita á allar skattaborgarar um, so tíðliga sum gjørligt í 1984, at lata eina uppgerð inn til skattavaldið yvir A-inntøkurnar í 1. ársfjórðingi 1984. Hetta verður gjørt fyri at fyribilsskattur og endaligur skattur skal samsvara so neyvt sum gjørligt, tá árið er lokið.

*3. stk.* Henda regla er galdandi fyri teir persónar, sum hava verið í vinnu uttanlands og goldið skatt har, og sum flyta aftur til Føroyar uttan at hava verið uttanlands í eitt ár, og tí ikki koma undir regluna í 1. stk.

Loyvt verður slíkum persónum at draga skatt goldnan uttanlands í 1983 av inntøku, sum er vunnin har, frá álíknaða skattinum í Føroyum í skattaárinum 1983/84, men tó ongantíð meira enn svarandi til tann í Føroyum álíknaða skattin fyri skattaárið 1983/84. Inntøka, sum vunnin er uttanlands í hesum tíðarskeiði, skal tá takast við í uppgerðini av skattskyldugu inntøkuni í Føroyum í 1983.

**7. gr.** Skyldu til at gjalda skatt av møguligari fluttari inntøku hava allir persónar, sum sambært 20. gr. í hesum uppskoti skulu álíknast fyri inntøkuárið 1983. Tá avgerast skal, um ein persónur lýkur treytirnar fyri skattskyldu, skulu reglurnar, sum vóru galdandi fyri skatta-

árið 1983/84, verða nýttar. Hetta ber í sær, at galdandi skattareglur um flyting úr Føroyum, andlát og 22. gr. a í galdandi skattalóg, eisini galda fyri skatt av fluttari inntøku.

Um t.d. ein persónur, sum býr her tann 1. apríl 1984, og tí hevur skyldu at gjalda skatt av fluttari inntøku, seinni í 1984 flytir úr Føroyum, heldur skattskyldan uppat eftir somu reglum, sum vóru galdandi fyri skattaárið 1983/84. Flytir persónurin t.d. 1. oktober 1984, so skal hann bert gjalda helvtina av skattinum av fluttari inntøku. Reglan er eisini galdandi fyri persónar, sum eru avmarkað skattskyldugir.

**Flutt inntøka**

Orsøkin til at skotið verður upp at gera reglur um flutta inntøku er, at roynt eigur at verða forðað fyri, at nakar kann sleppa undan at skatta av meirinntøku við at broyta roknskaparligu mannagongdina, bert tí inntøkan í 1983 ikki verður løgd til grund fyri álíkningini í 1984/85.

Inntøka kann antin verða flutt til 1983 við at inntøkuupphæddir verða fluttar til tað árið, ella við at útreiðslur verða minkaðar í 1983 fyri so at verða fluttar til seinni inntøkuár.

*1. stk. í 7. gr.* nevnir dømir um, hvussu inntøkan kann flytast við at broyta roknskaparligu mannagongdina í mun til undanfarin ár. tá henda regla verður nýtt, eigur dentur at verða lagdur á, um hin skattskyldugi, tá hann hevur gjørt inntøkuna upp ella roknskapin, hevur tikið nakrar avgerðir sum bert eru tiknar, tí inntøkan í 1983 í høvuðsheitinum ikki skal skattast, og sum hann annars ikki vildi havt tikið. T.v.s. at slíkar avgerðir skulu víkja munandi frá teimum, hann annars hevði tikið, um inntøkan í 1983 varð skattað á vanligan hátt.

*Í 7. gr.* verða tvey sløg av fluttari inntøku umrødd. 1. stk. umtalar inntøkur, sum eru fluttar til inntøkuárið 1983 við at broyta mannagongdina, tá 1983-inntøka verður gjørd upp, ella við at broyta aðrar fyriskipanir, sum hava samband við roknskaparførsluna ella inntøkuuppgerðina, eitt nú minking av avskrivingum, broyting í uppgerðarháttinum av vørugoymsluni o.t. Við øðrum orðum, so snýr tað seg her um tær roknskaparligu avgerðirnar, sum ikki bera í sær nakra veruliga øking í inntøkuni, eitt nú:

1. Hækking av inntøkuni við at minka um avskrivingarprosentið av rakstrargøgnum í mun til árini frammanundan.
2. Hækking av inntøkuni við at minka prosentið í mun til árini frammanundan, sum vørugoymslan upptald til útsøluprís verður niðurskrivað til.

3. Hækking av inntøkuni við at aktivera tey í 3. gr., I. stk. í avskrivingarlógini umrøddu rakstrargøgn, í staðin fyri at draga tey frá yvir rakatur, tá hetta hevur verið mannagongdin árini frammanundan.
4. Hækking av inntøkuni við at broyta roknskaparligu mannagongdina í mun til árini frammanundan, tá arbeiðir í gerð verða uppgjørd.
5. Hækking í inntøkuni við at broyta vanliga galdandi avtalur um tíðarfreistir fyri, nær lokin arbeiðir ella útveganir (leverancer) skulu avroknast.

Sjálvt um avskrivingarprosentið fyri rakstrargøgn er minkað munandi í 1983, so kann hetta ikki altíð verða mett sum flutt inntøka. Um vinningurin áðrenn avskrivingar í 1983 í einum virki er fallin munandi í mun til árini frammanundan, so kann tað ikki sigast at vera broyting í mannagongdini ella øðrum fyriskipanum í samband við roknskaparførsluna at minka avskrivingarprosentið fyri at fáa eina vissa útjavnan av skattskyldugu inntøkuni.

Heldur ikki er talan um flutta inntøku, um hækkingin í skattskyldugu inntøkuni kemur av, at hin skattskyldugi ikki hevur lagt í fløgugrunn, sjálvt um hetta hevur verið vanligt frammanundan.

Í flestum førum kemur avgerðin, um nær vit hava við flutta inntøku at gera, at byggja uppá eitt met, og vegleiðandi kann her verða, um skattskylduga inntøkan er hækkað munandi í mun til tað, sum hevur verið vanligt tey seinastu árini. Um hetta ikki er so, vil vanliga ikki verða talan um at skatta flutta inntøku.

Er inntøkan økt orsakað av reglunum í avskrivingarlógini um inntøkuskatting av afturvunnum avskrivingum, so kunnu vit heldur ikki nýta reglurnar um flutta inntøku. Sambært reglurnar í 17. gr., so skal afturvunning avskriving skattast fyri seg við ávísum prosenti.

At ein persónur hevur økt um sína egnu arbeiðsorku, søluna ella minka um útreiðslurnar í virkinum kann ikki verða mett sum flutt inntøka.

*2. stk. í 7. gr.* ásetur hvørjar reglur eru galdandi, tá tað snýr seg um útgjaldingar frá feløgum v.m. av løn, tantieme o.l. út um tað, sum higartil eftir partafelagsins viðurskiftum hevur verið vanligt.

Um eitt høvuðspartaeigarafelag hækkar løn ella tantieme til høvuðspartaeigaran, og samstundis lækkar vinningsbýtið í mun til tað, sum hevur verið galdandi árini frammanundan, so er øll orsøk til at meta hetta sum flutta inntøku.

Er hetta eitt nýstovnað felag soleiðis, at ikki er møguligt at meta saman við eldri ár, má metingin gerast út frá um útgjaldingin kann

sigast at vera rímulig í mun til fíggjarliga úrslitið í felagnum. Annars skal altíð, tá tað snýr seg um útgjalding av løn og tantieme, verða samanhorið við, hvussu høgar vanligar útgjaldingar av umrødda slag hava verið í árinum frammanundan, og hvønn sáttmála viðkomandi hevur við felagið/virkið.

*3. stk.* ásetur, at bert tann parturin av fluttari inntøku, sum er størri enn 25.000 kr. verður álagdur ein skatt upp á 50%, og verður hesin skattur býttur javnt millum landskassan og avvarðandi kommunu.

*Í 8. gr.* verður ásett, at somu reglur, sum eru galdandi tá skattskyldug inntøka var uppgjørd fyri inntøkuárið 1982, skattaárið 1983/84, eisini eru galdandi fyrti inntøkuárið 1983.

*Í 9. gr.* verða reglur ásettar fyri, nær skattur av fluttari inntøku skal gjaldast, og kann ein slíkur skattur longu verða álíknaður og goldin í 1984, hvat ikki kemur at verða galdandi, tá tað snýr seg um skatt av meirinntøku, tí ein slíkur skattur av meirinntøku kann ikki verða álíknaður og goldin fyrr enn í 1985.

*10. gr.* Her verða ásettar reglur fyri hvør tað er, sum skal skattast av meirinntøku. Deyðsbúgv koma ikki undir hesa reglu. Treytin fyri at gjalda skatt av meirinntøkuni í 1983 er, at ein er skattskyldugur her í landinum pr. 1/4-1984, men fyri at finna útav um skattskyldan er til staðar, verða 1. gr., nr. 1 ella 2 og 2. gr. 1. stk. litra d, e ella f í lógini um samtíðarskatt nýttar.

Hesar reglur snúgva seg um persónar, sum eru skattskyldugir her, tí teir hava bústað her ella hava havst bústað her fyrr, og persónar sum eru avmarkað skattskyldugir her, tí teir reka vinnuvirki ella eiga fastogn v.m. her á landi. Persónar, sum eftir reglunum í 1. gr. 1. stk. ikki eru skattskyldugir, skulu heldur ikki gjalda skatt av meirinntøku. Soleiðis sum henda regla er orðað, vil tað, at vanliga persónliga skattskyldan heldur uppat aftan á 1/4-1984, bera í sær, at skattur av meirinntøku skal gjaldast jvm. 15. gr., 2. stk.

*2. stk. nr. 1.* Giftar kvinnur eru ikki sjálvstøðugt skattskyldugar eftir galdandi reglum. Lógin um samtíðarskatt broytir heldur ikki hesa skipan.

Um ein gift kvinna verður sundurlisin ella skild í tíðini 1/4-84 til 31/12-84, so verður hon samstundis sjálvstøðugt skattskyldug, og skal setast í skatt av meirinntøku. Í 14. gr., 1. stk. verður skotið upp, at meirinntøkan hjá manninum í slíkum førum bert skal roknast við hansara inntøku sum grundarlag.

*2. stk. nr. 2.* Sambært 12. gr. 2. stk. skal ein skattgjaldari kunna krevja, at ístaðin fyri 1984 verður 1982 nýtt sum javnmetingarár. Um

hann ikki er samskattaður við hjúnafelagan bæði í 1982 og 1983, so skal, eftir 14. gr. 2. stk. í hesum uppskoti, bert hansara inntøka leggjast til grund fyri útrokning av meirinntøkuni. Sum avleiðingar av hesum verður tí skotið upp, at konan í hesum føri hevur skyldu til at gjalda skatt av síni meirinntøku.

*Stk. 3.* Her verður skotið upp at gera trý undantøk frá skatting av meirinntøku:

1. Persónar, sum eru fluttir til Føroyar aftaná 1. juli 1982, fáa einki skattafrítt tíðarskeið, tí pr. 1. apríl 1984 koma hesir undir samtíðarskatt.
2. Persónar, sum doyggja innan árslok 1984, gjalda heldur ikki skatt av fluttari inntøku eftir hesum uppskoti.
3. Eisini verður skotið upp, at einkjur, sum eru komnar undir sjálvstøðuga skattskyldu pr. 1. januar 1983, ikki skulu gjalda skatt av fluttari inntøku.

Sambært galdandi reglur verða børn sett sjálvstøðugt í skatt. Í hesi reglu er ongin broyting gjørd við lógini um samtíðarskatt. Skyldan til at lata skatt av meirinntøku vil tí eisini umfata børn, sum eru sett sjálvstøðugt í skatt.

**11. gr.** Sambært núgaldandi reglur, fellur skattskyldan burtur hjá kvinnu, sum heldur uppat við vinnuligari inntøku í seinasta lagi 3 mánaðar aftaná at hon giftist, treytað av, at hon ikki tekur uppaftur arbeiðið, áðrenn 2 ár eru farin, frá tí hon helt uppat. Skotið verður upp, at fyri kvinnu, sum er sett í skatt eftir hesi reglu, verður heldur galdandi so leingi 2 ár ikki eru farin frá tí, hon var sett í skatt eftir henni.

**12. gr.** Meirinntøka verður í princippinum gjørd upp, sum tann parturin av skattskyldugu inntøkuni í 1983, ið fer upp um skattskyldugu inntøkuna í 1984, hækkað við 30.000 kr. og 50.000 kr. fyri ávikavist levsar persónar og hjún (javnmetingarinntøkan). Í skattskyldugu inntøkuni fyri 1983 verður ikki roknað við afturvunnum avskrivingum, jvmt. 17. gr. Skotið verður eisini upp, at tá meirinntøkan verður gjørd upp, verður sæð burtur frá tí partinum av fluttari inntøku, sum er skattað, soleiðis at skilja, at bert tann skattaði parturin omanfyri 25.000 kr. av fluttari inntøku verður drigin frá, tá meirinntøkan verður gjørd upp.

Hin skattskyldugi kann krevja, at javnmetingarinntøkan í staðin verður roknað eftir skattskyldugari inntøku fyri inntøkuárið 1982.

Líkningarvaldið skal kanna, hvat av árunum 1982 ella 1984 er til hansara fyrimun at verða javnmettur við, og javnmeta hann við tað árið, sum er til hansara fyrimun. Ein treyt fyri hesum er, at hann er skattskyldugur her í landinum í 1982, ella ein part av árinum 1982.

Í slíkum førum skal inntøkan roknast um, so hon lutfalsliga kemur at svara til fulla ársinntøku.

**13. gr.** Tá javnmetingarinntøkan hjá hjúnum verður gjørd upp, verður inntøkan løgd saman ávikavist fyri 1983 og javnmetingarárið. Eru tey gift í millum 1/1 - 31/3-1984, verða tey samskattað fyri 1983, og skal inntøkan hjá teimum í 1983 tí verða løgd saman og javnmetast við samanløgdu inntøkuna fyri 1984.

**14. gr.** Um hin skattskyldugi ikki er samskattaður við hjúnafelagan 1/4-1984, so skal meirinntøkan gerast upp hjá hvørjum sær, og eisini sjálvt um tey giftast seinni í 1984.

Um hjún lúka treytirnar fyri samskatting 1/4-1984, men verða skild ella sundurlisin fyri árslok 1984, verður hildið rættast, at meirinntøkan eisini í slíkum føri verður gjørd upp hvørt sær, jvmt. 10. gr. 2. stk nr. 1. Sambært 12. gr. 2. stk. kann hin skattskyldugi velja, at meirinntøka verður gjørd upp við inntøkuárinum 1982 sum javnmetingargrundarlag. Um nú hjúnini bert eru samskattað fyri annað av inntøkuárunum 1982 ella 1983, skal meirinntøkan verða gjørd upp fyri hvørt av hjúnunum, jvmt. 10. gr. 2. stk. nr. 2. Hetta hevur týdning, um hjúnini eru samskattað í 1983, men ikki í 1982.

Hetta ber í sær, at vit skulu býta inntøkuna sundur hjá samskattaðum hjúnum. Til inntøkuna hjá konuni, tað árið tey eru samskattað, verður roknað øll tann inntøka, sum hon, sambært 4. gr. í løgtingslóg um samtíðarskatt, er sett í skatt av fyri seg, og eisini inntøka, ið løgd er aftur at inntøku mannsins, aftaná tey eru gift, men sum vildið hoyrt til hennara skattskyldugu inntøku, um tey vóru sett í skatt sum leysir persónar.

Frádráttur fyri útreiðslur av at vinna inntøkuna verður drigin frá hjá tí, sum hevur havt inntøkuna, sum gevur hesar frádráttir.

**15. gr.** Skattur av meirinntøku verður roknaður við 40%.

Dømi 1. Hjún:

| | | |
|---|---|---|
| Samlað skattskyldug inntøka fyri 1983 ..... | | kr. 250.000 |
| Samlað skattskyldug inntøka fyri 1984 ..... | kr. 190.000 | |
| Hækkað sambært 12. gr. ..... | kr. 50.000 | 240.000 |
| Meirinntøka ..... | | kr. 10.000 |
| Skattur ..... | 40% av 10.000 = 4.000 kr. | |

Dømi 2. Leysur persónur:

| | | |
|---|---|---|
| Samlað skattskyldug inntøka fyri 1983 ..... | | kr. 170.000 |
| Samlað skattskyldug inntøka fyri 1984 ..... | kr. 120.000 | |
| Hækkað sambært 12. gr. ..... | kr. 30.000 | 150.000 |
| Meirinntøka ..... | | kr. 20.000 |
| skattur ..... | 40% av 20.000 = 8.000 kr. | |

Tá útrokningin av meirinntøkuni hevur samband við skattskyldugu inntøkuna fyri 1984, kann hon ikki verða roknað út fyrr enn í fyrra hálvári av 1985. Tí verður skotið upp, at hon fellur til gjaldingar í í seinna hálvári av 1985. Fyri at lætta um innheintingina verður skotið upp, at reglurnar í 136. gr. í løgtingslóg um samtíðarskatt eisini verða galdandi fyri innheinting av meirinntøku.

**16. gr.** Her verður skotið upp, at 40% av skattinum av meirinntøku fellur til kommununa, og 60% til landskassan. Tapið av tí, sum av eini ella aðrari orsøk ikki kann heintast inn, verður býtt lutfalsliga millum kommununa og landskassan í mun til skattin.

**17. gr.** Her verður skotið upp, at afturvunnar avskrivingar, sum sambært avskrivingarlógina skulu takast við í skattskyldugu inntøkuna fyri 1983, í staðin fyri at verða roknaður við í skattskyldugu inntøkuna hetta ár, verða skattaðar fyri seg við 50%. Tó kunnu slíkar afturvunnar avskrivingar verða mótroknaðar í einum møguligum halli í skattskyldugu inntøkuni fyri 1983.

**18 gr.** Her verður ásett, at ein persónur, sum í 1983 hevur verið fyri tapi sambært 9. gr., 5) í galdandi skattalóg, kann velja, um hann vil draga hetta tap frá lutvís ella til fulnar í inntøkuárinum 1983 ella 1984.

**19. gr.** Keypssamtøkur, framleiðslu-, sølu- og keypsfeløg eru skatt-

skyldug frá 1. apríl 1984 eftir løgtingslóg um samtíðarskatt. Rakstrarroknskapur og figgjarstøða hjá slíkum felagsskapum skal gerast upp eftir somu reglum, sum eru galdandi fyri partafeløg. Nakrar broytingar eru tó gjørdar í mun til partafeløg, jmt. løgtingslóg um samtíðarskatt.

Tað skattaár, sum hesi feløg fyrstu ferð verða skattað í, verður nevnt skiftisskattaárið. Roknskaparárið, sum verður lagt til grund fyri skattinum í skiftisskattaárinum, er tað roknskaparár, sum fellur saman við ella endar í álmanakkaárinum 1984. Roknskaparárið er 12 mánaðir, og gongur frá endanum av tí tíðarskeiði, sum einasti almenni roknskapurin er gjørdur fyti, áðrenn henda lóg fær gildi, og 12 mánaðir fram.

Maskinur, innbúgv, innleggingar og innrættingar og tílík rakstrargøgn kunnu avskrivast sambært reglunum í avskrivingarlógini. Tað saldovirðið, sum liggur til grund fyri avskrivingum, tá hesi feløg v.m. verða skattskyldug, er sambært 3. stk. saldovirði, sum er gjørt upp í seinasta almannakunngjørda roknskapinum til parthavarar, limir v.m. ella í almennum lýsingarblað fyri roknskaparárið frammanundan skiftisskattaárinum. Í skiftisskattaárinum og seinni ár, verður keyp og søla av rakstrargøgnum mett eftir reglunum í avskrivingarlógini. Harumframt kann tann parturin av gjørdum avskrivingum, sum fer upp um hægst loyvdu skattligar avskrivingar tey seinastu 5 árini áðrenn skiftisskattaárið, verða lagdur afturat saldovirðinum.

Dømi:

| Útvegað fyri | avskrivað í roknskapi | loyvd avskr. 30% | Saldo |
|---|---|---|---|
| 1979 kr. 500.000 | 500.000 | 150.000 | 350.000 |
| 1980 kr. 500.000 | 500.000 | 255.000 | 595.000 |
| 1981 kr. 100.000 | 100.000 | 208.500 | 486.500 |
| 1982 kr. 200.000 | 200.000 | 205.950 | 480.550 |
| 1983 kr. 100.000 | 100.000 | 174.160 | 406.390 |

Í hesum døminum kunnu 406.390 kr. verða lagdar afturat saldovirðinum í skiftisskattaárinum.

Tá tap uppá rakstrargøgn skal gerast upp í skiftisskattaárinum ella seinni sambært 4. gr. 1. stk. í avskrivingarlógini skal verða roknað við tí virði, sum hetta er tikið við í saldovirðinum samb. 3. stk.

*5. stk.* Bygningar, sum loyvt verður at avskriva uppá kunnu avskrivast sambært reglurnar í avskrivingarlógini. Fyri bygningar, sum eru

keyptir/bygdir í árinum frammaundan skiftisskattaárinum, kann verða avskrivað av keyps-/byggivirðinum. Samlaðu avskrivingarnar av slíkum bygningum skulu tó minkast við teimum avskrivingum, ið kundu verið gjørdar, tá roknað verður við fullum vanligum avskrivingum av nevndu bygningum í ognartíðini frammanundan skiftisskattaárinum. Tá hendа uppgerð verður gjørd, skal verða roknað við teimum avskrivingum, sum kunnu gerast aftaná tað 10. inntøkuárið. Fyri teir í 17. gr. 1. stk. a í avskrivingarlógini nevndu bygningar við 2% um árið og fyri bygningar nevndir í 17. gr. 1. stk. b við 1% um árið.

Um tíðarskeiðið uppá 10 ár, har hækkaðar avskrivingar kunnu gerast (4 ella 6% av útveganarvirðinum), ikki er lokið, kunnu í skiftisskattaárinum og fyrti restina av 10 ára skeiðinum, hækkaðar avskrivingar verða gjørdar.

Dømi: Ein bygningur, sum er útvegaður í skattaárinum 1979/80 fyri kr. 2.000.000, kann avskrivast sambært 17 gr. 1. stk. b í avskrivingarlógini.

Fyri skattaárini frá og við 1985/86, og til og við 1988/89, kann verða avskrivað við 4% um árið, og síðani við 1% um árið av kr. 2.000.000.

Samlaða avskrivingin skal minkast við teimum vanligu avskrivingunum, sum kundu verða gjørdar í skattaárinum frá og við 1979/80 til og við 1984/85, ella við tilsamans 6 x 1% av kr. 2.000.000 = 120.000 kr., soleiðis at íalt kann ikki skattliga verða avskrivað meira enn kr. 1.880.000.

**20. gr.** áskur nærri reglur um sjálvuppgávuna og álíkningina, hvør skal álíkna, upplýsingarskyldu í heiula tikið í samband við flutta inntøku, og meirinntøku og kærumøguleikan.

**21. gr.** Roknaður frítíðarpeningur fyri 1983 skal sambært galdandi reglur takast við í inntøkuuppgerðina fyri inntøkuárið 1983, hóast hesin peningur ikki verður útgoldin fyrr enn aftaná 1. mai 1984. 1. apríl 1984 kemur afturhaldsskipanin eftir samtíðarskattalógini í gildi, soleiðis at øll løn goldin út eftir henda dag skal um góðkend ávísingarstøð. Fyri at lætta um fyrisitingina bæði hjá arbeiðsgevarum og skattavaldinum, soleiðis at ikki skal verða neyðugt at skilja millum útgoldna løn og samsýning, sum ikki skal skattast, og sum skal skattast, tá afturhaldsskipanin eftir samtíðarskattalógini er komin í gildi, verður her skotið upp, at frítíðarpeningur vunnin í 1983 verður skattaður, tá hann kemur til útgjaldingar í 1984.

**22. gr.** Her verður ásett, at kommunu- og kirkjuskattaprosentini fyri 1984 og barnafrádrátturin í kommunuskattinum skulu ásetast í seinasta lagi 1. februar 1984, sum galdandi fyri tíðarskeiðið 1/4 - 31/12 - 84. Fyri seinni inntøkuár verða reglurnar í løgtingslóg um samtíðarskatt galdandi.

**23. gr.** gevur landsstýrinum rætt til at seta tey tiltøk í verk, sum skulu til fyri at fyrisita lógina.

**24. gr.** Her verður skotið upp, at lógin fær gildi beinanveg hon verður lýst.

1. viðgerð 7. november. Málið varð beint í skattanevndina, sum 6. december legði fram soljóðandi

## Álit

Uppskot til lóg um skiftisreglur varð lagt fyri tingið av landsstýrinum tann 28. oktober 1983, og varð undir 1. viðgerð, sum fór fram 7. november í ár , beint í skattanevndina.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Ein meiriluti í nevndini (Eli Nolsøe, Hilmar Kass og Jógvan Sundstein) mælir til at samtykkja lógaruppskotið við hesum broytingum:

1) Í § 3, 1. stk. verður aftaná 1. skoytt uppí: »Inntøka, sum er vunnin og givin til skattingar í 1983, men útgoldin í 1984, verður ikki tikin við sum skattskyldug inntøka í útgjaldingarárinum.«

1) I § 3, stk. 1 tilføjes efter 1. pkt.:
»Indkomst, der er indtjent og medtaget til beskatning i 1983, men først udbetalt i 1984, medtages ikke som skattepligtig indkomst i udbetalingsåret.«

**Viðmerkingar:**

Sambært lógini um samtíðarskatt skal øll inntøka, sum verður útgoldin í 1984 takast við sum skattskyldug inntøka hetta árið. Hetta uppískoytið vil tí forða fyri, at inntøka, sum er vunnin og skattað í 1983, men útgoldin í 1984, eisini verður tikin við sum skattskyldug inntøka í 1984.

2) Í § 21 verður sett sum nýtt 2. stk.:

»*2. stk.* Løn, sum sambært sáttmála verður útgoldin í desember 1983 sum forútgoldin løn fyri januar mánað 1984 fyri persónligt arbeiði í tænastu fyri onnur, skal takast við í skattskyldugu inntøkuna fyri 1983. Sama regla er galdandi fyri almannaveitingar, sum koma undir regluna í § 60 5) í lógini um samtíðarskatt, og sum verða útgoldnar í desember 1983, sum forútgoldnar veitingar fyri januar mánað 1984.«

2) I § 21 tilføjes som nyt stk. 2:

»*Stk. 2.* Løn, som ifølge overenskomst bliver udbetalt i december 1983, som forudbetalt løn for januar måned 1984 som vederlag for personligt arbejde i tjenesteforhold, skal medregnes i den skattepligtige indkomst for 1983. Samme bestemmelse er gældende for alle sociale ydelser som omfattes af § 60, 5) i kildeskatteloven, og som udbetales i december 1983 som forudbetalte ydelser for januar måned 1984.«

**Viðmerkingar:**

Av umsitingarligum orsøkum er her skotið upp, at allar forútgoldnar lønir og almannaveitingar, ið verða útgoldnar í desember 1983 sum løn og almannaveitingar fyri januar 1984 verða skattskyldugar í 1983. Sostatt verður høvuðsreglan varðveitt, at bert skattskyldugar upphæddir, ið eru útgoldnar í 1984, verða tiknar við í hesum ári og framyvir.

Ein minniluti (Petur Reinert) førir fram.

24. mars 1983 varð lóg um samtíðarskatt framløgd. Henda lóg er øðrvísi enn áður viðtiknar skattalógir á tann hátt at:

1) Forskotsskattur verður uppkravdur samstundis sum peningur verður forvunnin.
2) Peningastovnarnir skulu nú krevja henda skatt inn.

Annars kann ikki sigast, at nakrar prinsipiellar broytingar eru í hesi nýggju skattalóg frá øðrum skattalógum, sum vit hava livað við, seinast skattalógini frá 1963. T.d. er inntøkuhugtakið tað sama og somu reglur eru galdandi fyri revsing fyri brot á lógina.

Løtingslóg um skattaáseting varð løgd fram hin 4. august 1983. Her verður gjørd ein roynd at hava sama skattatrýst sum áður, verður sagt; men andstøðan fekk hvørki stundir ei heldur útrokningar til at viðgera hetta mál. Okkara kanningar vísa í dag:

*at* lág og miðalinntøkur ikki fá nakran lætta,
*at* pensjónistar koma framvegis at gjalda munandi í skatti,
*at* endurgjaldið fyri børn er lítið,
*at* B-inntøkur fáa stóran fyrimun í samband við skattgjalding
og
*at* partafeløg fáa kreditt uppá 9 mánaðir aftrat.

Hetta mál varð skundað ígjøgnum, og hesum vil Tjóðveldisflokkurin mótmæla, serliga av teirri orsøk, at her kundi verið høvið til at fingið eina rættvísari skatting av fólki, men tað, sum er hent, er eftir okkara tykki, at skattingin er uppaftur órættvísari enn frammanundan, soleiðis at allir fyrimunir eru til teirra, sum hava bestu ráðini og umstøðurnar at gjalda skatt.

Nú verður so at enda lóg umskiftisreglur framløgd. Henda lógin viðger »skattafría« árið 1983.

Lógin viðger meirinntøku, flutta inntøku, skatting av sølufelag við meira og hvussu fyrsti ársfjórðingur av 1984 skal viðgerast skattliga, tá samtíðarskatturin kemur í gildi 1. apríl 1984.

Tjóðveldisflokkurin er í stórum iva, um henda lóg er nóg greið og nóg løtt at umsita. Ivin er m.a. galdandi fyri:

1) Flutta inntøku. Her er orðalagið veikt, og stórt arbeiði skal til fyri at finna hesa.
2) Fyrst skulu afturhaldast 75% og tá endaligi skatturin skal uppgerast, so 72%. Hví skal samfelagið leggjast á hesi 3 prosentini?
3) Allar B-inntøkur fáa 25.000 í fluttari inntøku.

Tjóðveldisflokkurin tekur í prinsippinum undir við, at vit fáa eina samtíðarskattaskipan, sum flokkurin eisini gjørdi lógaruppskot til fyri 23 árum síðani — nevniliga í tingsetuni 1960. Men flokkurin vil harðliga átala, at hetta fyri hvønn samfelagsborgara í landinum so álvarsliga mál, verður skundað ígjøgnum á henda hátt.

Fylgilógirnar sýna skilliga, at har eru nýggj fyribrigdi, sum áttu at verið umhugsað væl og virðiliga, áðrenn tey vórðu kroyst niðuryvir skattgjaldararnar í Føroym. Vit mugu í hesum sambandi vísa á EDV-lóggávuna og ta enn tørvandi eftirlitslóg við hesum EDV-skráum. Eftir okkara tykki er óvist, ógvuliga óvist um nýggi inngjaldingarhátturin í samabnd við samtíðarskatting yvirhøvur fæst at virka frá 1. apríl 1984 og var tað tí nógv betur, um samfelagið sum heild var nógv betur fyrireikað at taka við hesi nýggju skipan.

Flokkurin vil átala, at so týðandi spurningar sum niðanfyri nevndu hava fingið so tilvildarliga viðgerð eins og tað verður átalað, at støðugt so nógv liggur á láni. Vit meta:

1. *at* skattatrýstið verður uppaftur størri á lág- og miðalinntøkurnar,
2. *at* B-skattgjaldarar og partafeløg sleppa uppaftur lagaligari,
3. *at* ongar lógir um skráseting eru lýstar,
4. *at* ongar deildarskrivstovur enn eru settar á stovn,
5. *at* ongar reglugerðir eru kunngjørdar,
6. *at* eingin upplýsing av skattaborgarunum av týdningi enn er farin fram,
7. *at* grov brot einans skulu koma undir politiskan dómstól,
8. *at* líkningarvaldið er so illa mannað og skúlað til at klára so stóra umlegging, at stórur ivi er, um tað yvirhøvur klárar hesa uppgávu.

Niðurstøða floksins má tí verða, at um vit í prinsippinum ganga inn fyri samtíðarskatting, so eru hesar lógir, sum landsstýrið er komið við, so ófullfíggjaðar og í høvuðsheitinum so órættvísar, at flokkurin ikki sær seg føran fyri at greiða atkvøðu í hesum máli, líka so lítið sum vit greiddu atkvøðu fyri sjálvari skattalógini. Flokkurin mælir tí til at løgtingið viðtekur, at samtíðarskattingin verður útsett til 1. januar 1985, fyri at samfelagið alt og stovnar tess kunnu verða betur førir fyri at umsita lógirnar.

Minniluti setur tí fram soljóðandi

*uppskot*
*til*
*samtyktar*

Løgtingið viðtekur, at samtíðarskattingin verður útsett til 1. januar 1985 fyri at samfelagið alt og stovnar tess kunnu verða førir fyri at umsita lógirnar.

8. desember legði Vilhelm Johannesen fram soljóðandi

**broytingaruppskot**

Ein minniluti (Vilhelm Johannesen) førir fram:

Tær lógir, sum skulu heimila yvirgongd til samtíðarskatt, hava fingið ógvuliga lítla viðger- í løgtinginum og skattanevnd tingsins. Hetta hevur avdúkað, at samgonguflokkarnir hava gjørt sær lítlan ómak fyri at umhugsa eina skattaskipan, sum lýkur tey grundleggjandi krøv, setast mugu eini slíkari.

Neyvan hevur áður í slíkum stórmáli verið sýnt vandamálum og ivamálum í skipanini so lítlan ans sum her, og royndirnar til at upplýsa um, hvussu tey hundraðtals ymisku viðurskifti, ið regulera sam-

bandið ímillum borgara og myndugleikar skulu tulkast og skiljast, bava verið nærum ongar, tí er ikki løgið, at ikki bert andstøðutingmenn, menn eisini samgongutingmenn og landsstýrismenn tykjast vita lítið um, hvussu skipanin fer at roynast.

Men støða er jú heldur ikki tikin til hóp av viðurskiftum í samband við lógirnar, og tað tykist sum samgongumenn annaðhvørt halda, at hetta er andstøðuni og almenninginum óviðkomandi, ella at tað eigur at verða latið embætis- og umsitingarvaldinum, bankum og datafeløgum at avgera allar hesar spurningar og tulka teir.

Tey grundleggjandi krøvini til eina skattaskipan mugu vera:

*at* hon er einføld,

*at* hon er løtt at umsita,

*at* hon er bílig at umsita og

*at* hon er rættvís ella alsamt gerst rættvísari,

men hesi krøv eru als ikki nøktað í lógaruppskotið landsstýrisins.

Javnaðarflokkurin hevur leingi virkað fyri og tikið undir við at fremja eina samtíðarskattaskipan, men hevur ikki tikið undir við tí hátti, samgongan hevur valt. Hesar skiftisreglur eru partur av samlaðu loysn samgongunnar, og er tí ein natúrlig fylgja, at javnaðarflokkurin heldur ikki tekur undir við teimum, og als ikki kann gera tað, tí reglurnar meira enn áður økja órættvísið ímillum vanligar løntakarar og onnur.

Flokkurin hevur greitt víst á brekini í uppskotum samgongunnar og serliga drigið fram, hvussu út av lagi tilvildarlig viðgerðin hevur verið, so tilvildarlig, at allar tær lógir og reglur, sum skuldu verið trygd og vernd borgarans, ikki eru gjørdar, soleiðis at hann má kenna seg givnan einum privatum innkrevjingarstovni og bankunum í vold. Einum stovni, sum løgting og landsstýri hava frásagt sær ávirkan á, tí eingin sáttmáli er gjørdur við hendan. Tað skal ikki nógv hugflog til at ætla um kostnaðin av innkrevjingini, tá hesin skal ásetast, aftaná at samgongan hevur forskrivað seg til eina loysn, sum nú ikki kann broytast aftur, uttan at skipanin verður útskotin.

Tað tykist sum ávegis arbeiði, sum undanfarna samgonga gjørdi fyri at fyrireika eina kelduskattaskipan, tá verstu ójavnarnir í frádráttarjungluni vórðu lúkaðir burtur, og fremja bruttoskatting, nú partvís er farin fyri skeytið.

Urslitið verður tí, at tað, sum skuldi gerast ein lætti fyri vanliga skattaborgaran og ein einfaldgeran, sum slapp honum undan at koma í ov stórar eftirstøður, nú gerst ein kleppur fyri hann, tí skipanin

hækkar honum skattin og skattatrýstið, skerjir likviditet hansara

so við og við og gevur honum eyka byrðar at bera, tí hann skal fíggja tað stóru likviditetsrúmkan, sum B-skattgjaldarar varandi skulu hava,
Beinan vegin gevur honum byrðarnar av teimum nógvu túsund ferðir 25.000 kr., sum samgongan hevur biðið sokallað vinnurekandi flyta undan skatting í skiftisárinum.

Slíkum órættvísi kann Javnaðarflokkurin ikki taka undir við, men hevur í staðin fyri mælt til at fylgja fyridømi teirra, sum hava roynt slíka broyting í skattaskipan, nevniliga at fyrireika skipanina væl, samstundis sum galdandi skipan - ið møguliga kortini kemur at halda fram - verður hildin við líka.

Hetta hevði merkt:

*at* skattaálíkningin varð fingin í góða legu, so sum undanfarna samgonga setti pening av til,
*at* skattaútskrivingin var í lagi,
*at* bókingin var í lagi,
*at* ein EDV-skipan varð uppbygd.
*at* ein verunlig kelduskattalóggáva, og neyðugar fylgilógir síðan vórðu smíðaðar.

Verandi viðurskifti, har líkningar- og útskrivingararbeiðið hevur ligið á láni, har bókingin er út av lagi, har borgarin fær pantikrav omaná pantikrav eftir skatti, hann hevur goldið, ella ongantíð visti hann skyldaði, og har eingin kvittan verður latin fyri gjaldið, tí tað verður ikki bókað, eru ikki gott støði at byggja nýggja skipan á.

Slíkt kaos gevur ikki álit á, at ábyrgdarfult er farið til verka fyri nýggju skipanina.

Hetta sæst eisini av tí hópi av óhepnum fyribrigdum, sum borgarar í serligari støðu verða fyri, og sum stutta tíðarskeiðið, síðan lógirnar komu fram, hevur avdúkað.

Eitt dømi um munandi broyting er støða teirra, ið útbúgva seg, og sum vegna vánaligar fíggjarmøguleikar, skuld og skattaeftirstøður, eru hart fyrispent.

Javnaðarflokkurin heldur ikki, at slík fyribrigdi generelt eiga at verða loyst ígjøgnum skattalógina. Tað eru mangar aðrar lógir og fyriskipanir, sum kundu bøtt um í slíkum førum, eitt nú útbúgvingarstuðulslóggáva, møguleikarnir fyri at seta búgv, sosial lóggáva og annað, men kortini metir flokkurin, at so leingi hesi viðurskifti eru so ófullfíggjað, sum tey eru, átti tað at verið møguligt í eitt ávíst áramál at virka við slíkum heimildum í skattalógini, at møguleiki var

fyri at lætta um skattatrýstið, tá órímilig øking kemur fyri.

Tað kundi út frá sokallaðum »objektivum kriterium« viðvíkjandi sosialari støðu, lønarlagi, lestrarskuld, skattaskuld og øðrum verið møguligt at veitt rætt til rentufría gjaldskipan yvir nóg langt áraınal.

Slík fyribrigdi, sum her nevndu, tykjast ikki viðgjørd av samgonguni eins lítið og viðurskiftini hjá øðrum bólkum og einstaklingum, sum verða illa fyri av skiftinum í skattalógini.

Tí vónar javnaðarflokkurin og heitir á samgonguna, at hon - um hon kortini trumfar hesa skipan ígjøgnum - skjýtur upp reglur, sum regulera slík viðurskifti, eitt nú neyðugar broytingar í løgtingslógini um skattaáseting, tann lógin fekk jú onga viðgerð í tinginum, hóast hon fyri borgaran má kennast sum tann týdningarmesta í skipanini.

2. viðgerð 8. desember. § 1 varð samtykt við 17-0 atkvøðum, § 2 samtykt við 17-0, § 3 við broyting frá nevndini samtykt við 17-0, §§ 4-20 samtyktar við 17-0, § 21 við broyting frá nevndini samtykt við 17-0, §§ 22-23 samtyktar við 17-0, § 24 uttan atkvøðugreiðslu. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 17-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar frá minnilutanum í skattanevndini fall við 7-0 atkvøðum.

9. december legði Karin Kjølbro, løgtingslimur, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

Tjóðveldisflokkurin tekur til eftirtektar, at samgongan við 2. viðgerð hevur samtykt at seta lóg um skiftisreglur í verk uttan at umhugsa tey fyrivarni, sum Tjóveldisflokkurin vísti á í minnilutaáliti sínum.

Flokkurin ynskir tí at seta fram uppskot til samtyktar um broyting av ríkisskattalógini fyri at bøta um ringastu avleiðingarnar:

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum at leggja fyri tingið uppskot til broytingar í nýggju skattalógini soleiðis at

1. at lækkað verður um skattatrýstið á lág- og meðalinntøkum við 2%,

2. at fólkapensjónistar verða skattafríir, um teir ikki hava aðra inntøku enn fólkapensjónina,
3. at familjur við børnum fáa endurgjald og fáa útgoldið 1.000 kr. hvønn ársfjórðing. Hendan skipan verður galdandi fyri inntøkur, har foreldrini í felag hava undir 150.000 kr. í ársinntøku. Hendan upphæddin verður prístalsviðgjørd,
4. at minka verður um kredittin hjá B-inntøkum og partafeløgum,
5. at uppskot verður gjørt um yvirgangsskipan fyri fólk undir útbúgving.

3. viðgerð 9. december.

Broytingaruppskotið fall við 14 ja-atkvøðum, 17 atkvøddu ikki, 1 var burturstaddur. Atkvøtt var við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Juul Jacobsen, Adolf V. Hansen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Beck, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Arne Ziskasen, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Edmund í Garði, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Jacob Lamhauge, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein.

Burturstaddur: Atli P. Dam.

Málið soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 17 ja-atkvøðum, 6 nei-atkvøðum, 7 atkvøddu ikki, 2 vóru burturstaddir. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Arne Ziskasen, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Edmund í Garði, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Jákup Lamhauge, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein.

Nei atkvøddu: Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert.

Atkvøddu ikki: Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen.
Burturstaddir: Vilhelm Johannesen og Atli Dam.

F.L.j.nr. 430-12-45-4. Lóg nr. 118 frá 29, december 1983.

---

# 12. Stovnsetan av føroyskum pensjónsgrunnum.

Ár 1983, fríggjadagin 28. oktober legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at fyrireika stovnsetan av føroyskum pensiónsgrunnum og at skipa so fyri, at tey, sum nú gjalda til danskar pensiónsgrunnar, í staðin gjalda til føroyskar pensiónsgrunnar.

**Viðmerkingar:**
Her á landi er eitt stórt tal av fólki, sum er lønt eftir donskum avtalum, og eitt stórt tal sum er danskt lønt. Í flestu førum eru hesi sáttmálabundin at vera tryggjað í pensiónsgrunni. Og alt gott um tað.

Hesi somu hava kunnað lænt pening úr egnum pensiónsgrunnum, men til eina forholdsvís høga rentu.

Pensiónsupphæddirnar eru skipaðar soleiðis í mun til pensiónsgjaldið, at ein vanligur pensioneraður fær. tá hann er vorðin gamal, renturnar av tí peningi viðkomandi hevur inngoldið gjøgnum arbeiðsliv sítt. Soleiðis verður grundupphæddin verandi hjá pensiónsgrunninum. Tað er eingin loyna, at pensiónsgrunnarnir eru teir, sum gera størstu íløgurnar í ymiskt samfelagsneyðugt, so sum skrivstovubygningar, íbúðablokkar o. tl. Við tað at grundupphæddin vanliga ikki verður útafturgoldin, er hon akkumulerandi, og sum sovorðin hevur hon ein vaksandi týdning fyri landsins búskap.

Tað mest vanliga gjaldið til tílíkar pensiónsgrunnar er 4 + 4% av inntøkuni. Tað vil siga, at tann pensioneraði skal gjalda 4% av sini bruttoinntøku til pensiónsgrunnin, meðan arbeiðsgevarin skal gjalda somu upphædd.

Gjald til pensiónsgrunnar kann dragast frá á skattauppgávuni, men sum kompensatión fyri frádráttin skal gjaldast 35% av útgoldnari upphædd, um so er, at tann pensioneraði í ótíð uppsigur pensiónsavtaluna og fær hana útgoldna. Í løtuni tekur danski statskassin eitt tilsvarandi gjald, sum tó er 40 %, eisini frá føroyskum pensioneraðum. Hetta hevur ført við sær at føroysku skattamyndugleikarnir ikki hava tikið tey 35%, fyri at dupultskatting ikki skal fara fram. Her er so statt talan um, at føroyingar gjalda skatt til danska statskassan av upphæddum, sum føroyski landskassin hevur sviðið fyri gjøgnum frádráttirnar.

Mett verður, at tær upphæddir sum fara av landinum og/ella ikki koma til landið, liggja um einar 20 mill. kr. árliga. Tá hugsað verður um, at henda upphædd er akkumulerandi, so kann við vissu sigast, at tað hevur stóran búskaparligan týdning, um peningurin verður verandi í landinum.

Hartil kemur, at peningurin kann verða nýttur til t.d. húsalán ella annað líknandi, sum kann vera við til at lætta um í húsarhaldinum hjá hinum einstaka. Annars er uppskotsstillarin av teirri áskoðan, at tey pensioneraðu eiga at hava ein lánifyrimun í pensiónsgrunnunum.

1. viðgerð 11. november. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 5. december legi fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av Adolf V. Hansen, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 28. oktober 1983 og undir 1. viðgerð tann 11. november 1983 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 30. november 1983 og vóru til fundin umboð fyri Føroya Lívstrygging og fyri Tryggingarsambandið »Føroyar« boðsend.

Umboðini fyri tryggingina høvdu ta støðu til fyriliggjandi mál, at spurningurin um pensjónsgrunnar er ein ógvuliga víttfevnandi problematikkur. Møguligar lóggávuloysnir krevja eitt eftirlit, sum ikki er í galdandi lóggávu. Slíkt lógarverk er ein torfør uppgáva og krevur gjølligt innlit í slík mál.

Landsstýrismaðurin Torbjørn Poulsen og Eyðun á Rógvi Olsen, stjóri fyri Líkningarráð Føroya, komu eisini á fund við fíggjarnevndina og umrøddu teir serliga teir skatligu spurningarnar.

Meirilutin (Juul Jacobsen, Atli P. Dam, Ove Mikkelsen, Sv. Åge Ellefsen og Øssur Dam Jacobsen) setir fram soljóðandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landstýrinum at virka fyri, at pensjónsgjøld verða goldin til føroyskar eftirlønarskipanir, soleiðis at peningurin verður í landinum.

Minnilutin (Ivan Johannesen og Hilmar Kass) hevur ta støðu, at tá landsstýrið arbeiðir við eftirlønarspurninginum sum heild, verður einki uppskot sett fram.

2. viðgerð 8. december. Uppskotið til samtyktar frá meiriluta í nevndini samtykt við 18-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1410-8-15.

# 13. Føroyar kjarnorkuvápnafrítt øki.

Ár 1983, fríggjadagin 28. oktober legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Í samljóði við samtykt løgtingsins 19. august 1970 um at Føroyar skulu haldast uttan fyri ósemjur landanna millum, og at sýtt verður fyri at strðsútgerð verður goymd á føroyskum land- ella sjóøki, lýsir løgtingið Føroyar — bæði land- og sjóøki — at vera kjarnorkuvápnafrítt øki.

Landsstýrinum verður álagt at boða donsku ríkisstjórnini frá hesi samtykt við áheitan um at neyðug tiltøk henni viðvíkjandi verða tikin.

**Viðmerkingar:**

Á aðalfundi Sameindu tjóða 1978, har niðurtøka av vápnum var til viðgerðar, var einmælt gjørd samtykt, har løgd var mannagongd, ið m.a. segði, at »kjarnorkuvápnafrí øki er týdningarmikil táttur í niðurtøku av vápnum«. Og lagt var aftur at, at »styðjað eigur at verða upp undir at fáa slík øki ymsar staðir í heiminum við tí endamáli at skapa heim heilt uttan kjarnorkuvápn«.

Í inngangingum til hesa samtykt verður m.a. sagt: »Mannaættin stendur í dag andspennis higar til ókendari hóttan um sjálvstýning, ið er avleiðing av kappdubbingini við teimum mest oyðileggjandi vápnum, ið nakra tíð hava verið framleidd«.

Longu framman undan — árið 1967 — gjørdu latínamerisku londini sáttmála sín á millum — Tlatelolco-sáttmálan — um Latín-Ameriku sum kjarnorkuvápnafrítt øki.

Øll kjarnorkuveldi heimsins hava nú viðurkent hetta kjarnorkuvápnafría øki og hava givið lyfti um at virða hesa samtykt.

Tað eru 20 ár síðan finski forsetin Kekkonen setti fram hugmynd

sína um Norðurlond sum kjarnorkuvápnafrítt øki. Vit føroyingar fara ikki at leggja okkum út í, hvat ið onnur Norðurlond gera, men vit halda, at vit — við at samtykkja uppskot sum hetta um Føroyar sum kjarnorkuvápnafrítt øki — kunnu vera teimum til fyrimyndar.

Hetta uppskotið er eisini í fullum samljóði við samtykt løgtingsins frá 1970, um at Føroyar verða hildnar uttan fyri ósemjur landanna millum, og um at vit sýta fyri at stríðsútgerð verður goymd á føroyskum land- ella sjóøki.

1. viðgerð 9. november. Adolf V. Hansen skeyt upp, at málið varð afturtikið við tí grund, at tað var landsskaðiligt. Hetta uppskotið fall við 4-0 atkvøðum.

Málið varð síðani beint í marknaðarnevndina, sum 22. februar 1984 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram tann 28. oktober 1983 og undir 1. viðgerð tann 9. november beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur á fundi tann 21. februar 1984 viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd til at samtykkja uppskotið við hesi broyting. Orðið »øki« umfatar: land-, sjó- og luftøkið, og tí verður uppskotið til samtyktar broytt til soljóðandi:

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Í samljóði við samtykt løgtingsins 19. august 1970 um, at Føroyar skulu haldast uttan fyri ósemjur landanna millum og at sýtt verður fyri, at stríðsútgerð verður goymd á føroyskum øki, lýsir løgtingið Føroyar at vera kjarnorkuvápnafrítt øki.

2. viðgerð 24. februar. Uppskotið til samtyktar varð samtykt við 23-0 atkvøðum.

# 14. Hjálpiamboðsmiðstøð fyri brekað.

Álagt verður landsstýrinum at seta á stovn hjálpiamboðsmiðstøð maður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at seta á stovn hjálpiamboðsmiðstøð fyri brekað.

**Viðmerkingar:**
Ein amboðsmiðstøð fyri brekað er helst meira neyðug enn vit við fyrstu atløgu geva okkum far um. Ein miðstøð, har fólk kunnu siggja tað, sum er frammi av amboðstilboðum, og sum er til taks, har tey kunnu fáa vegleiðing í brúkinum av amboðum, og har eisini framsýning kann vera av tí, sum frammi er á marknaðinum.

Tað er helst so, at ein helst ikki reiðiliga kann vita, hvørji hent amboð eru til taks, um ikki ein støð er, har hjálpiamboð finnast, soleiðis at fólk lættari fær hendur á teimum røttu hjálpiamboðunum.

Nú eru ár liðin, síðani hetta mál varð tikið upp, landsstýrið má nú liggja við nóg neyvum tilfari til at loysa málið.

Tað er ikki vist, at miðstøðin skal vera á landssjúkrahúsinum, tað skal vera ein støð fyri øll, sum brúk hava fyri stuðulsamboðum. Amboðsmiðstøðin má liggja soleiðis, at hon er løtt atkomilig fyri brekað; harfyri skulu amboðini ikki hópast á einum stað, tey kunnu goymast á sjúkrahúsum, røktarheimum o.t. støðum.

Javnaðarflokkurin setir fram uppskot til samtyktar um hjálpiamboðsmiðstøð, tí tað røkist ikki fyri loysn í bræði, uttan so at løgtingið áleggur landsstýrinum nú at loysa málið.

Løgtingstíðindi 1983 A — 18

1. viðgerð 9. november. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram á ting av Javnaðarflokkinum og varð við 1. viðgerð tann 9. november 1983 beint í sosialu nevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin m.a. havt fund við Páll Vang, landsstýrismann. Landsstýrismaðurin greiddi frá, at á fíggjarlógini 1983/84 vórðu avsettar kr. 150.000 og í 1984/85 kr. 200.000 undir Landssjúkrahúsinum til hetta endamál. Ætlanin er at byrja við at seta eitt kvalifiserað fólk til at skráseta øll verandi amboð og síðani at byggja upp eina veruliga miðstøð.

Nevndin hevur eisini havt samband við Elin Mørkøre, yvirlækna, og metir hon eisini, at uppbyggingin av hjálpiamboðsmiðstøðini kann fara fram á henda hátt. Men fyritreytin er, at tað verður byrjað, og at áðurnevnda fólk verður sett.

Støðan sær sostatt út at vera tann, at Løgtingið hevur veitt peningajáttanirnar til at byrja arbeiðið. Ábyrgdin ma ti liggja hjá landsstýrinum og sjúkrahúsfyrisitingini at fáa gongd á arbeiðið.

Um ein slík miðstøð sum frálíður skal hava høli á sjúkrahúsinum ella aðra staðni, er ein annar spurningur. Tað týdningarmikla í løtuni er, at gongd kemur á, og at farið verður undir arbeiðið beinanvegin.

Út frá hesum viðmerkingum setir nevndin tí í staðin fyri uppskot Javnaðarfloksins fram hetta

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Landsstýrið verður biðið um beinanvegin at syrgja fyri at við teim peningajáttanum, sum eru tøkar, at fara undir arbeiðið við hjálpiamboðsmiðstøð fyri brekað og at seta fólk at stilla fyri hesum.

2. viðgerð 8. mai. Uppskotið frá nevndini samtykt við 28-0 atkvøðum.

# 15. Grundarlag fyri javnføring av einkjuhjálp og hjálp til stakar uppihaldarar.

Ár 1983, mikudagin 2. november legði Jákup Lindenskov, løgtingsmaður vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Í útrokningini av inntøkugrundarlagnum til javnføring av hjálparveiting til stakar uppihaldarar sambært forsorgarlógina, skal bert helvtin av arbeiðsinntøkuni roknast.

**Viðmerkingar:**
Broytingin í »Lov for Færøerne om offentlig forsorg« við gildi frá 1. juni 1983 gevur einum parti av einkjum og støkun uppihaldarum verri sømdir fíggjarliga enn frammanundan 1. juli 1983.

Í gomlu reglunum í forsorgarlógini § 22, 3. stk., síðsta punktum — henda lógargrein, sum hevur yvirskriftina »Hjælp til enker og enlige forsørgere« — er orðaljóðið: »dog at der kan ses bort fra indtil halvdelen af en arbejdsindtægt.«

Í staðin fyri hesa orðingina um bert at mótrokna helmingin av arbeiðsinntøkuni, tá inntøkugrundarlagið skal finnast fyri framtíðar javnføring av hjálp frá tí almenna, tá arbeiðsinntøka er uppií, er í staðin fyri orðingina »at der ses bort fra indtil halvdelen af arbejdsindtægten« komið at standa í viðmerkingunum til nýggju lógina við gildi frá 1. juli 1983, at øll arbeiðsinntøkan skal roknast, tá frádráttargrundarlagið skal finnast, »indtægter fradrages altid fuldtud i den højst mulige hjælp«.

Sostatt skal nú øll arbeiðsinntøka dragast frá í útrokningargrundarlagnum í staðin fyri sum frammanundan bert helvtin av arbeiðsinntøkuni.

Broytta forsorgarlógin, sum nú er meira lík donsku Bistandslógini, sundurgreinar ikki meira hvørji sløg av hjálp, ið skulu veitast, men setir tørvin fyri hjálp í tí einstaka førinum sum avgerandi.

Javnaðarflokkurin heldur tað vera ímóti tingsins hugsan, at einkjur og stakir uppihaldarar nú verða verri fyri — og setir tí fram uppskot til samtyktar um, at gamla siðvenjan í forsorgarlógini verður nýtt, um at bert helvtin av arbeiðsinntøkuni hjá støkum uppihaldarum skal leggjast sum grundarlag undir útrokningini av møguligari javnføring av almennari hjálp.

1. viðgerð 11. november. Málið var viðgjørt saman við nr. 16: Broyting í løgtingslóg um uppískoytisveiting til einkjur. Bæði málini vórðu beind í sosialu nevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av Javnaðarflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 11. november 1983 beint í sosialu nevndina.

Tað sær út til, at nýggja reglan í lógini er komin, uttan at ætlanin hevur verið at gera støðuna hjá einkjum og støkum uppihaldarum verri.

Meirilutin (Jógvan Sundstein, Fredrik Olsen, Eli Nolsøe og Karin Kjølbro) heitir á landsstýrið um at kanna málið, men setir annars einki uppskot fram.

Minnilutin (Jóanncs Dalsgaard) tekur undir við uppskoti Javnaðarfloksins.

2. viðgerð 8. mai. Uppskotið til samtyktar fall við 15-0 atkvøðum.

# 16. Broyting í løgtingslóg um uppískoytisveiting til einkjur.

Ár 1983, mikudagin 2. november legði Jákup Lindenskov, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um uppískoytisveiting til einkjur.**

**§ 1.** Í løgtingslóg nr. 36 frá 4. mai 1977 um uppískoytisveiting til einkjur verður gjørd henda broyting:

Í § 4 verður sett sum nýtt 5. stk.: »Í føri, har einkja sambært reglurnar í forsorgarlógini ikki meira er uppihaldari og tí missir einkjubarnastudningin, verður uppískoytisveitingin at falla burtur við einum helmingi eitt ár aftaná, at einkjubarnastudningurin er burturdottin og við hinum helminginum uppaftur eitt ár seinri.«

**§ 2.** Henda lóg fær gildi frá 1. oktober 1983.

**lagtingslov om tillægsydelse til enker.**

**§ 1.** I lagtingslov nr. 36 af 4. maj 1977 om tillægsydelse til enker foretages følgende ændring:

I § 4 indsættes som nyt stk. 5: »I det tilfælde, at en enke efter reglerne i forsorgsloven ikke længere er forsørger og derfor mister enkebørnsbidraget, bortfalder tillægsydelsen med den ene halvdelen et år efter, at enkebørnsbidraget er bortfaldet, og den anden halvdel yderligere et år senere.«

**§ 2.** Denne lov træder i kraft 1. oktober 1983.

**Viðmerkingar:**
Sambært løgtingslóg um uppískoytisveiting til einkjur, er tað ein treyt, at einkja hevur í minsta lagi eitt barn at uppihalda, sum er undir 18 ár. Tá barnið fyllir 18 ár, fellur einkjubarnastudningurin og uppískoytisveitingin burtur.

Hetta er ein sera munandi og knapplig inntøkuskerjing uttan, at onnur inntøka er í heintað og kennist tungur missur so knappliga.

Í 1977 samtykti løgtingið serligu lógina um uppískoytisveitingina til einkjur, av tí at tingið vildi geva hesum samfelagsbólki betri sømdir.

Uppískoytisveitingin til einkjur fekk gildi 1. oktober 1977.

Frá komandi 1. í tí mánaðinum eftir, at barnið er fylt 18 ár — tá uppihaldsskyldan formelt er uppathildin — minkar veitingin við tilsamans kr. 1.636,—, nevnliga við einkjubarnastudninginum kr. 536,— pr. barn — og uppískoytisveitingini kr. 1.100,— um mánaðin.

Javnaðarflokkurin metir tað vera rímuligt at gera yvirgongdina so líðandi og mælir til at broyta lóggávuna samsvarandi, nevniliga soleiðis at helvtin av uppískoytisveitingini fellur burtur 1 ár aftaná, at barnastudningurin er burturfallin og hin helvtin eitt ár seinri.

1. viðgerð 11. november. Málið varð viðgjørt saman við nr. 15: Grundarlag fyri javnføring av einkjuhjálp og hjálp til stakar uppihaldarar. Bæði málini vórðu beind í sosialu nevndina, sum 5. desember legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av Javnaðarflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 10. november 1983 beint í sosialu nevnd.

Nevndin ásannar, at uppískoytisveitingin til einkjur ikki skal minka so knappliga, tá seinasta barnið verður 18 ár.

Ein minniluti (Karin Kjølbro og Jóannes Dalsgaard) tekur undir við uppskoti Javnaðarfloksins og mælir til at samtykkja tað.

Meirilutin (Jógvan Sundstein, Eli Nolsøe og Fredrik Olsen) mælir til í staðin fyri uppskot Javnaðarfloksins at samtykkja fylgjandi

**uppskot
til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um uppískoytisveiting til einkjur.**

§ 1. Í løgtingslóg nr. 36 frá 4. mai 1977 um uppískoytisveiting til einkjur verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 2 verður sett sum nýtt 2. stk.:
»*2. stk.* Rætt til uppískoytisveiting hevur eisini einkja, sum hevur hildið uppat at eiga rætt til einkjupensjón av tí grund, at hon ikki meira hevur børn undir 18 ár. hesin rættur stendur við í eitt ár aftaná at rætturin til einkjupensjón er hildin uppat.«

2. Í 9 3 verður sett sum nýtt 2. stk.:
»*2. stk.* Uppískoytisveiting sambært § 2, 2. stk,. er helmingurin av uppískoytisveiting sambært 1. stk. Uppískoytisveiting sambært § 2, 2. stk., verður at rokna út á sama hátt sum fyrisett í § 4, og sum um einkjan átti rætt til einkjupensjón«.

§ 2. Henda lóg fær gildi frá 1. oktober 1983.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om tillægsydelse til enker.**

§ 1. I lagtingslov nr. 36 af 4. maj 1977 om tillægsydelse til enker foretages følgende ændringer:

1. I § 2 indsættes som nyt stk. 2:
»*Stk. 2.* Ret til tillægsydelse har tillige enke, hvis ret til enkepension er ophørt, fordi hun ikke længere har børn under 18 år. Retten fortsætter i 1 år efter at retten til enkepesion er ophørt.«

2. I § 3 indsættes som nyt stk. 2:
»*Stk. 2.* Tillægsydelse i henhold til § 2, stk. 2, udgør halvdelen af beløbet i henhold til stk. 1. Tillægsydelse i henhold til § 2, stk. 2, beregnes på samme måde som fastsat i § 4, og som om enken havde ret til enkepension.«

§ 2. Denne lov har gyldighed fra 1. oktober 1983.

2. viðgerð 8. december. § 1 í upprunauppskotinum fall við 14-0. Uppskotið frá meirilutanum í nevndini § 1 samtykt við 30-0, 2, stk. samtykt við 28-0, § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. At fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð samtykt við 30-0 atkvøðum.
3. viðgerð 15. december. Uppskotið soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1010-5. Lóg nr. 120 frá 29. dec. 1983.

# 17. Setan av nevnd at kanna spurningar í sambandi við løgtingssamtyktirnar nr. 31/1974 og nr. 1/1982: Føroya undirgrund og havbotnur.

Ár 1983, mikudagin 9. november legði marknaðarnevndin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Marknaðarnevndin verður heimilað at seta serkøna nevnd at kanna spurningar í samband við løgtingssamtyktinar í ávikavist løgtingsmáli nr. 31/1974 (vetrarting): Føroya undirgrund og nr. 1/1982: Undirgrund og havbotnur. Nevndarlimirnir verða valdir við meirilutavali. Marknaðarnevndin ásetir arbeiðssetningin hjá nevndini. Tøkur peningur verður at seta av til endamálið.

**Viðmerkingar:**
Sum gjørt løgtinginum kunnugt, hava samráðingar verið førdar við ríkisstýrið sum samtykt. Samráðingarnevndin metir, at tað ikki kemst longur í málinum um at fáa eina danskt/føroyskt setta nevnd at kanna spurningar í samband við nevndu løgtingssamtyktir. Tí er avgjørt at skjóta upp, at heimastýrið sjálvt setir niður nevnd at kanna spurningarnar í samband við løgtingssamtyktirnar frá 1975 og 1983.

Ætlanin er, at nevndin skal lata sítt tilfar til marknaðarnevndina.

2. viðgerð 11. november. Atli Dam bað um at fáa málið aftur í mark-

naðarnevndina. Adolf Hansen og Petur Reinert bóðu um víðari viðgerð. Formaðurin setti tí uppskot um, at málið *ikki* varð beint aftur í nevnd. Uppskotið fall við 13-0 atkvøðum.

27. januar 1984 legði marknaðarnevndin fram soljóðandi

**Álit**
**í**

**løgtingsmáli nr. 17/1983: Setan av nevnd at kanna spurningar í sambandi við løgtingssamtyktirnar nr. 31/1974 og nr. 1/1982: Føroya uudirgrund og havbotnur.**

Málið varð lagt fram av marknaðarnevndini tann 7. november 1983, og varð málið beint í marknaðarnevndina aftaná framløguna.

Marknaðarnevndin hevur á fundi sama dag viðgjørt málið og lagt fram uppskot til samtyktar.

Undir viðgerðini av málinum tann 11. november var málið beint aftur í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur á fundi tann 28. december 1983 aftur viðgjørt málið.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Hilmar Kass, Jógvan Sundstein, Olaf Olsen, Karin Kjølbro og Erlendur Patursson) mælir til, at málið óbroytt verður beint tinginum til viðgerðar.

Ein minniluti (Jørgen Thomsen) viðmerkir:

Javnaðarflokkurin hevur havt tingmál nr. 17: Setan av nevnd at kanna spurningar í samband við løgtingssamtyktirnar nr. 31/1974 og nr. 1/1982: Føroya undirgrund og havbotnur til umhugsunnar av nýggjum.

Í samband við undirgrundspurningin setti samgongan eina nevnd av trimum monnum úr samgonguni, hesir vóru løgtingsformaðurin, formaðurin í marknaðarnevndini og løgmaður.

Tað er vert at viðmerkja í hesum sambandi, at løgtingsformaðurin gjørdist samráðingarleiðari, meðan landsins løgmaður einans var vanligur nevndarlimur. Tað er Javnaðarfloksins metan, at tað ikki kann hava positiva ávirkan, at føroyski stjórnarleiðarin heldur seg aftan fyri í so týdningarmiklum samráðingum. Eisini má ásannast, at her er nýtt óvanlig mannagongd, við tað at løgmaður, ið umsitur uttanríkismál ikki hevur viljað fært hesar samráðingar.

Javnaðarflokkurin hevur fleiri ferðir víst á, at hendan nevndin varð sera óhóskiliga samansett.

Víst var á, at antin skuldi ein slík nevnd veljast av løgtinginum, helst við einum limi úr hvørjum flokki á tingi, ella skuldi sjálvt landsstýrið ført hesar samráðingar við donsku stjórnina, um eina loysn á undirgrundspurninginum. Hetta var mest náttúrligt.

Men av tí, at vit hava eitt sera ósamt landsstýri, serstakliga tá ið tað snýr seg um viðurskiftini ímillum Føroyar mótvegis Danmark.

Har afturat er komið til sjóndar, at løgmaður er hugaður fyri, at tikið verður við eini ráevnisskipan eins og grønlendingar.

Tí kann Javnaðarflokkurin ikki mæla til, at landsstýrið førir hesar samráðingar. Hóast at tað í prinsippinum var rættast.

Tí loyvir flokkurin sær at mæla til, at løgtingið velur nevnd við einum limi úr hvørjum flokki á tingi.

Trímannanevndin, sum samgongan setti, hevur ásannað, at ikki kemst longur við samráðingum við donsku stjórnina, enn at gera málsøkið Føroya undirgrund til føroyskt sermál.

Teir triggir Jógvan Sundstein, Pauli Ellefsen og Hilmar Kass, heittu tí á marknaðarnevndina um at seta uppskot til løgtingið, sum heimilaði marknaðarnevndini at seta serkøna nevnd.

Hesum tók ein samd nevnd undir við, eisini umboð javnaðarfloksins, so sum øllum kunnugt.

Tá ið málið var til fyrstu viðgerð, stungu fleiri ivaspurningar seg upp í hesum sambandi. Serstakliga viðvíkjandi fortreytum nevndarlimanna og arbeiðssetningi nevndarinnar. Har umframt vildi Javnaðarflokkurin útvega sær trygd fyri, at málið ikki varð blokkerað av § 13 í samgonguskjalinum, soleiðis at ávirkan floksins harvið varð av ongum.

Tí heitti Javnaðarflokkurin á løgtingið um at beina málið aftur í marknaðarnevndina til nágreiniligari viðgerð og umhugsunar av hesum ivaspurningum.

Hetta var samtykt av løgtinginum. Javnaðarflokkurin kennir seg ikki fullvísan í, at allir samráðingarmøguleikar eru troyttir við donsku stjórnina.

Hesir eiga tó at verða tiknir upp av nýggjum á ein skilabetri hátt.

Har afturat kann vísat á, at við fyriliggjandi uppskoti verður tað so, at samanseting av nevnd eins og av arbeiðssetningi, verður latin upp í hendurnar á tveimum flokkum, ið ikki hava góðkent ta heimastýrisskipan, sum vit virka undir. Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin hava meirilutan í marknaðarnevndini.

Javnaðarflokkurin kennir seg ótryggan við hesa mannagongd, og at hon einans kann skaða og forða fyri, at ein skilagóð loysn fæst á undirgrundspurninginum innan fyri karmin, ið heimastýrislógin setir.

Út frá hesum verður sagt frá, at minnilutin (Jørgen Thomsen) tekur stuðul sín til tingmál nr. 17 aftur og mælir tinginum frá at samtykkja uppskotið.

Í staðin fyri uppskotið frá markanaðarnevndini verður sett fram

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið velur nevnd við einum limi úr hvørjum flokki á tingi til at taka upp samráðingar við donsku stjórnina um undirgrundspurningin, sum hann fyriliggur.

Hendan nevndin kann søkja sær serkøna hjálp.

Av tí, at javnaðarflokkurin ynskir málsøkið Føroya undirgrund yvirtikið sum føroyskt sermál, og verður í staðin fyri uppskotið frá marknaðarnevndini sett fram uppskot til samtyktar.

Ein annar minniluti (Jógvan I. Olsen) sigur frá síni støðu seinni.

Framhaldandi 1. viðgerð 1. februar. Atkvøðugreiðslan útsett.

Atkvøðugreiðsla 2. februar. Uppskotið frá Adolf Hansen fall við 8 ja-atkvøðum, 24 atkvøddu ikki. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur M. Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Jacob Lindenskov, Atli Dam, Arne Ziskasen, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Olaf Olsen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen, Jacob Lamhauge, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Olsen.

Uppskotið frá meirilutanum í nevndini varð samtykt við 17-0 atkvøðum, og uppskotið frá Javnaðarflokkinum fall við 7-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1201-7.

# 18. Telefongjald til pensjónistar.

Ár 1983, mikudagin 9. november legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri tingið uppskot um endurgjald úr landskassanum til pensionistar o.l. fyri innleggingargjald og fastgjald av telefon. Telefonendurgjaldsskipanin skal hava gildi frá 1. januar 1983 og upphæddin setast á fíggjarløgtingslógina fyri 1984/85.

**Viðmerkingar:**
Ikki kann sigast, at føroyskir pensionistar hava ov mikið av peningi millum fingrarnar.

Meðan okkara lønar- og prislag er farið langt upp um tað danska, so eru pensiónirnar altíð afturút, við tað at tær eru reguleraðar av einum donskum prístali.

Pensiónirnar eru danskar og fær Føroya løgting tí ikki gjørt, sum tað vil, í hesum máli.

Tað er sjálvandi stak óheppið, at pensiónistarnir fáa sína pensión reguleraðar av einum stagneraðum donskum prístali, meðan útreiðslur teirra eru undirlagdar eina floymandi føroyska inflatión.

Men við einum góðum vilja ber til at stuðla tann bólkin av okkara fólki sum fær sína úrtøku um almannastovuna. Hetta kann til dømis gerast, við at landskassin endurrindar teimum tær føstu útreiðslurnar í samband við at fáa og hava telefon, soleiðis at pensionistar og aðrir njótarar av almannahjálp bert skulu gjalda fyri ta tíð, telefonin verður nýtt.

Tað eru um 6.000 pensionistar o.l., sum talan kann vera um at taka undir hesa skipan. Mett verður, at tey búgva í færri enn 4.000 íbúð-

um. Talan verður sostatt um eitt endurgjald, ið verður niðan fyri 3 mill. kr. árliga.

Hóast upphæddin ikki ljóðar av tí nógva, so er talan um 2 til 5% av inntøkuni hjá pensionistunum, alt eftir hvørja upphædd teir fáa. Sæð frá teirra sjónarmiði er talan um eina munandi upphædd.

1. viðgerð 11. november. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 15. december legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av Adolf V. Hansen tann 7. november 1983 og undir 1. viðgerð tann 11. november beint í fíggjarnevndina.

Eftir uppskotinum til samtyktar skal landsstýrið leggja fyri tingið uppskot um endurgjald úr landskassanum til pensionistar o.l. fyri innleggingargjald og fast gjald av telefon. Upphæddin verður at seta á komandi fíggjarløgtingslóg, og skal skipanin hava gildi frá 1. januar 1983.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 13. december 1983. Adolf V. Hansen gjørdi á fundinum vart við at dagfestingin í uppskotinum 1. januar 1983 skal vera 1. januar 1984.

Uppá fyrispurning hevur Telefonverk Føroya Løgtings upplýst, at talið av persónum, ið kann metast at koma undir uppskotnu skipanina er umleið 3000, og at endurgjaldið tá verður umleið kr. 2 mió. Fasta gjaldið er í dag kr. 720,— árliga og innleggingargjaldið kr. 650,—.

Viðvíkjandi stuðuli í dag á hesum øki til pensionistar hevur Almannastovan upplýst, at ongar serstakar reglur eru galdandi, men at Vanlukkutryggingarráðið í serligum førum, aftaná at tilmæli er útvegað frá lækna, játtar studning, ið svarar til umrøddu útreiðslurnar.

Fíggjarnevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirlutin (Ivan Johannesen, Sv. Aage Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen) vísir til tað ið upplýst er frá Almannastovuni og Telefonverkinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Atli P. Dam, Adolf V. Hansen og Ove Mikkelsen) mælir til at samtykkja uppskot Adolf V. Hansens.

2. viðgerð 24. januar 1984. Uppskotið fall við 14 ja-atkvøðum, 13 atkvøddu ikki og 5 vóru burturstaddir. Atkvøtt varð við navnakalli.

Ja atkvøddu: Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar

Bech, Jørgen Thomsen, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Ingrid Sondum, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen og Hans Marius Joensen.

Atkvøddu ikki: Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Arne Ziskasen, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Olaf Olsen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Jákup Lamhauge, Jústinus Poulsen og Jógvan Sundstein.

Burturstaddir: Agnar Nielsen, Fredrik Olsen, Jógvan Olsen, Jákup Lindenskov og Pauli Ellefsen.

---

# 19. Tiltøk at minka um tubbaksnýtsluna.

Ár 1983, mikudagin 9. november legði Páll Vang, landssýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

I

**Uppskot til**

**løgtingslóg um tiltøk at minka um tubbaksnýtsluna.**

§ 1. Endamálið við hesi lóg er at seta í verk tiltøk, sum minka skulu um skaðarnar, elvdir ella kunnu elvast av tubbaksnýtslu.

**lagtingslov om foranstaltninger med henblik på nedsættelse af tobaksforbruget.**

§ 1. Formålet med denne lov er at iværksætte foranstaltninger, som skal mindske skaderne, bevirket eller som kan bevirkes at tobaksforbrug.

§ 2. Í hesi lóg er tubbaksvøra at skilja sum:
a) vøra framleidd úr tubbakki ella vøra, sum hevur í sær tubbakk,
b) vøra, sum nýtt verður sum tubbakk, men ikki er framleidd úr tubbakki,
c) vøra, sum hevur samband við tubbaksnýtsluna, so sum sigarettpappírsbøkur, sigarettballarar, pípur, mundstykkir o.l.

§ 3. Lýsing við tubbaksvørum er ikki loyvd.
*2. stk.* Tubbaksvørur mugu ikki vera lutur í lýsingum fyri øðrum vørum ella tænastum.
*3. stk.* Landsstýrið kann við kunngerð gera undantak frá 1. stk. og 2. stk.

§ 4. Tað er ikki loyvt at selja ella lata tubbaksvørur til persónar undir 15 ár.

§ 5. Ikki er loyvt at selja tubbaksvørur, um hesar ikki eru merktar samavarandi reglum, ið landsstýrið fyrisetir í kunngerð, um innihald av tjøruevni, nikotini, kolsúrevni, o.a.t., og um og um vandan, ið stendst av tubbaksnýtslu. Eisini kann landsstýrið avgera, at tubbaksvørur, sum verða innfluttar til sølu, skulu verða merktat samsvarandi hesi kunngerð, og at hesar, tá tær verða innfluttar, skulu

§ 2. Tobaksvarer omfattet af denne lov anses:
a) varer, der fremstilles af eller indeholder tobak,
b) varer, der anvendes som tobak, men ikke er fremstillet af tobak,
c) varer, der har forbindelse med tobaksforbrug, såsom cigaretspapirbøger, cigaretrullere, piber, mundstykker o.l.

§ 3. Reklamer med tobaksvarer er ikke tilladt.
*Stk. 2.* Tobaksvarer må ikke indgå i reklame for andre varer eller tjenester.
*Stk. 3.* Landsstyret kan ved kundgørelse fastsætte undtagelse fra regelen i stk. 1 og stk. 2.

§ 4. Det er ikke tilladt at sælge eller overlade tobaksvarer til personer under 15 år.

§ 5. Det er ikke tilladt at sælge tobaksvarer, medmindre disse er mærket med de af landsstyret fastsatte regler i kundgørelse om indhold af tjærestof, nikotin, kulilte m.m., og såvel om faren, der opstår ved rygning. Landsstyret kan herunder bestemme, at tobaksvarer, der indføres med henblik på salg, ved indførsel skal være mærket i overensstemmelse med de af landsstyret fastsatte regler, og at der

hava eina váttan frá útlenska sølumanninum um merking.
*2. stk.* Eftir tilmæli frá tubbaksráðnum, jbr. § 6, fyrisetir landsstýrið í kunngerð hámarkið fyri tey í 1. stk. nevndu evni, og er ikki loyvt at selja tubbaksvørur sum innihalda meiri enn hámarkið sett fyri evnini.

ved indførselen foreligger erklæring fra eksportøren om mærkningen.
*Stk. 2.* Efter indstilling fra tobaksrådet, jvnf. § 6, fastsætter landsstyret de i stk. 1 nævnte stoffer, og er det ikke tilladt at sælge tobaksvarer, som indeholder mere end det fastsatte maksimum.

**§ 6.** At leggja landsstýrinum ráð í tubbaksspurningum og geva tilmæli í fremjing av lógini verður sett tubbaksráð við trimum limum, tilnevnd av landsstýrinum.

**§ 6.** Til at rådgive landsstyret i tobaksspørgsmål og give indstilling i udøvelse af loven sættes et tobaksråd med tre medlemmer, valgt af landsstyret.

**§ 7.** Brot á § 3, 1. og 2. stk., § 4 og § 5, 1. og 2. stk. verða sektað við bót.

**§ 7.** Overtrædelse af § 3, stk. 1 og 2, § 4 og § 5, stk. 1 og 2 straffes med bøde.

**§ 8.** Henda løgtingslóg kemur í gildi beinan vegin. § 5, 1. stk. kemur tó í gildi, tá landsstýrið fyrisetir hetta í kunngerð.

**§ 8.** Denne lagtingslov træder i kraft straks. § 5, stk. 1 træder dog i kraft, når dette fastsættes af landsstyret i kundgørelse.

**Viðmerkingar:**
Landsstýrið setti sambært løgtingssamtykt frá 28. apríl 1980 tann 3. december 1980 niður nevnd at gera uppskot um tubbakslóggávu.

Nevndin gav tann 3, juni 1981 álit frá sær og uppskot til løgtingslóg um tiltøk at minka um tubbaksnýtsluna, sí skjal 1.

Uppskotið hevur verið til viðgerðar í landsstýrinum. Landslæknin og landfútin eru spurdir í málinum, og hevur landsstýrið, eftir at hava fingið svar fútans og landslæknans, latið gjørt omanfyri nevnda uppskot sum byggir á álit tubbaksnevndarinnar.

Til tær einstøku greinirnar er at viðmerkja:

ad § 2: Skrá, snús og syntetiskt tubbak eru eisini tubbaksvørur.

ad § 3: Fyrimyndin fyri § 3 er § 2 í norsku lógini »om restriktive tiltak ved omsetningen af tobaksvarer m.v.« nr. 14 frá 9. mars 1973.
Ætlanin við undantaksregluni er at gera undantak frá forboðnum í teim førum, har tað vil bera í sær ógvuliga stórar praktiskar trupulleikar at hava eitt forboð ímóti lýsing, t.d. tá útlendsk bløð verða innflutt til Føroya.

ad § 4: Tað er ikki loyvt at selja tubbaksvørur til fólk undir 15 ár, heldur ikki um hesi hava skrivliga fulltrú. Mett verður, at um tey vaksnu ynskja tubbak, mugu tey keypa tað sjálv og ikki brúka børnini til tað.

ad § 5: Tubbak er ikki loyvt at selja, uttan so at innihalds- og ávaringartekstur er á øllum pakningum við tubbaksvørum. Fyri at lætta um eftirlitið kann í kunngerð ásetast, at skrivlig váttan um innihald av tjøruevni, nikotini, kolsúrevni o.a.t. fylgir við vøruni, tá hon verður innflutt. Útsøla av tubbaksvørum móti hesi grein verður umsitin av løgregluni og brot sektað við bót smb. § 7. Ætlanin er, at merkingin á pakkunum skal vera ymisk og orðað á sama hátt sum í Noreg, sí skjal 2a og 2b.

ad § 8: § 5, stk. 1 í lógini eigur ikki at verða sett í gildi fyrr enn tubbakssølumenn hava fyrireikað seg til hetta.

## II

## Uppskot til samtyktar

Álagt verður øllum stovnsleiðarum undir landinum at seta í verk reglur fyri royking á teirra stovni, háttaðar soleiðis at roykjarar verða til minst møguligan ampa fyri ikki roykjarar, t.d. eigur forboð at verða sett fyri royking í avgreiðsluhølum, fundarhølum og bíðirúmum, um ikki serstakt bíðirúm er fyri roykjarar.

**Viðmerkingar:**

Tubbaksnevndin, sum Føroya landsstýri setti niður sambært løgtingssamtykt frá 28. apríl 1980 skeyt upp í sínum uppskoti, at forboð varð sett fyri royking ávís nevnd støð, og at brot vórðu sektað við bót.

Landsstýrið hevur umhugsað málið, men er av teirri uppfatan, eftir at hava hoyrt landfútan í málinum, at hesar ásetanir ikki kunnu fyrisitast av løgregluni.

Sostatt hevði verið gjørd lóg, sum hvørki varð ella kundi verða hildin, og er hetta skaðiligt fyri rættartilvitskuna.

Í staðin verður mett rættast, at fyri landsins viðkomandi, stovnsleiðarar, gera reglur fyri royking á teirra stovni, og kommunurnar gera reglur fyri royking á teirra stovnum og syrgja fyri fyrisiting av hesum reglum.

Landsstýrið hevur ætlanir um at senda kommununum rundskriv, har heitt verður á bygda/býráð um at gera reglur fyri royking á kommunalum stovnum.

*Sí skjal 4.*

1. viðgerð 17. november. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 6. apríl 1984 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram á ting 9. november 1983 av landsstýrinum og varð við 1. viðgerð 17. í s.m. beint í sosialu nevndina.

Ein meiriluti (Jógvan Sundstein, Eli Nolsøe og Fredrik Olsen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til at samtykkja tað.

Minnilutin (Karin Kjølbro og Jóannes Dalsgaard) tekur undir við uppskoti landsstýrisins við hesum viðmerkingum.

Tað eru liðin 4 ár, síðani løgtingið samtykti at seta eina nevnd at koma við áliti um eina tubbakslóggávu.

Álitið var klárt 3. juni 1981, tá tað varð handað landsstýrinum.

Í hesum sambandi er vert at vísa á niðurstøðuna frá Alheimsheilsustovninum WHO viðvíkjandi royking, har sagt verður: »Góvust øll við at roykja sigarettir, hevði hetta verið til størri gagn fyri heilsustøðuna og økt meira um livialdurin í teimum framkomnu londunum enn nøkur onnur fyriskipan, sum í løtuni kann hugsat at hava fyribyrgjandi týdning.«

Hóast hetta er flestøllum greitt, og hóast sitandi samgonga í øllum hesum valskeiði hevur havt til viðgerðar álitið frá ráðleggingini viðvíkjandi útbygging av sjúkrahúsverkinum, so hava hesi týðandi mál ligið á láni.

Minnilutin tekur undir við uppskotinum hjá tubbaksnevndini um einkarsølu viðvíkjandi tubbaksvørum, men metir, at spurningurin eigur at verða viðgjørdur fyri seg og ikki sum partur av tubbakslógini.

Sama er at siga um, hvussu vit útvega pening til upplýsingararbeiði.

Tað bøtir ikki um álitið á landsstýrið, at teir geva sum orsøk fyri, at málið hevur drigið so langt út, at tað er tí at tað hevur verið til ummælis hjá ymiskum almennum stovnum. Eftir teim skjølum, ið hava verið tøk hjá sosialu nevnd, er talan um, at landsstýrið hevur sent málið til Ríkisumboðsstovnin, sum síðani hevur sent tað til Statsministeriið. Hetta er í fyrsta lagi skeiv mannagongd, og í øðrum lagi hevur tann parturin av málsviðgerðini tikið lutvísa stutta tíð.

Til tess at fyribygja at seinføri landsstýrissins í hesum máli heldur fram, mælir minniluttin til, at landsstýrið avgreiðir hetta mál beinanvegin, sum tað er avgreitt í løgtinginum.

2. viðgerð 10. apríl 1984. § 1 varð samtykt við 26-0, §§ 2-8 samtyktar við 25-0 atkvøðum. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 26-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar samtykt við 19-0 atkvøðum.

3. viðgerð 13. apríl 1984. Málið endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 939-1. Lóg nr. 94 frá 4. okt. 1984.

---

# 20. Lóg um »smitsomme sygdomme«.

Ár 1983, fríggjadagin 11. november legði Páll Vang, Landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

## Uppskot
## til
## samtyktar.

Løgtingið samtykkir at mæla ríkisstýrinum til at seta í gildi í Føroyum hjálagda »udkast til anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov nr. 114 af 21. marts 1979 om foranstaltninger mod smitsomme sygdomme«.

**Viðmerkingar:**
Ríkisstýrið hevur í skrivi dagfest 18. oktober 1982 sett fram fyrispurning, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 114 frá 21. mars 1979 »om foranstaltninger mod smitsomme sygdomme« verður sett í gildi í Føroyum við teim broytingum, sum hjálagda uppskot tilskilar.

Landslæknin, landfútin, landsdjóralæknin og ríkisumboðsmaðurin hava á fundi 8, oktober 1981 mælt til, at lóg um »foranstaltninger mod smitsomme sygdomme« verður sett í gildi í Føroyum.

Ein fylgja av, at lóg nr. 114 frá 21. mars 1979 »om foranstaltninger mod smitsomme sygdomme«, verður sett í gildi í Føroyum, er, at yvirheilsunevndin fellur burtur.

Yvirheilsunevndin er sambært standardheilsusamtyktina nr. 68 frá 29. september 1969 kærunevnd fyri avgerðum tiknar av heilsunevndunum. Landsstýrið hevur tí í hyggju, um lóg nr. 114 frá 21. mars 1979 »om foranstaltninger mod smitsomme sygdomme« verður sett í gildi í Føroyum, at skipa eina nýggja yvirheilsunevnd við at seta nýtt 2, pkt. í § 47, 2. stk. í standard heilsusamtyktini, sum er soljóðandi:

»Í yvirheilsunevndini sita tveir av landsstýrinum valdir limir, harav annar skal vera løgfrøðingur, og tríggir av løgtinginum valdir limir.«

1. viðgerð 17. november. Málið var uttan orðaskifti beint í lógarnevndina, sum 9. mars 1984 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið var framlagt av landsstýrinum 11. november 1983 og undir 1. viðgerð 12. í sama mánaði beint í lóganevndina.

Eftir uppskotinum verður mælt til at seta donsku lógina nr. 114 frá 21. mars 1979 om »foranstaltninger mod smitsomme sygdomme« í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan við ymsum broytingum. Eftir upp-

skotinum kemur føroyska »Epidemikommisiónin« at hava 4 føddar limir, nevnliga landfútan, landslæknan, landsdjóralæknan og stjóran á Føroya Gjaldstovu, og haraftrat 3 limir, sum landsstýrið velur. Landfútin verður eftir uppskotinum formaður í nevndini.

Tá nýggja lógin kemur í gildi, fellur yvirheilsunevndin burtur, við tað at hendan hevur heimild í gomlu lógini um smittandi sjúkur. Landsstýrið boðar samstundis frá, at tann nýggja yvirheilsunevndin verður skipað við einum uppískoyti til standard heilsusamtyktina.

Nevndin mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum, tó við teirri broyting, at epideminevndin ikki hevur nakran føddan formann, men skipar seg sjálv, og setir sostatt fram fylgjandi

**broytingaruppskot**

Landsstýrið samtykkir at mæla ríkisstýrinum til at seta í gildi í Føroyum hjálagda uppskot til kgl. fyriskipan um at seta lóg nr. 114 frá 21. mars 1979 »om foranstaltninger mod smitsomme sygdomme« við teirri broyting, at í § 3 í uppskoti til kgl. fyriskipan verða orðini »Landfogeden er formand for kommissionen« broytt til: »Kommissionen vælger selv sin formand«.

Við hesum áliti fylgir tað í uppskotinum umrødda uppskot til kgl. fyriskipan og eintak av lóg nr. 114 frá 21. mars 1979.

2. viðgerð 16. mars. Uppskotið frá nevndini samtykt við 22-1 atkvøðum.

F.L.j.nr. 927-11.

# 21. Lóg um viðurkenning av norðurlendskum avgerðum um privatrættarlig krøv.

Ár 1983, fríggjadagin 11. november legði Páll Vang, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 300 frá 8. juni 1977 »om anerkendelse og fuldbyrdelse af nordiske afgørelser om privatretlige krav og om ændring af retsplejeloven«, sum broytt við § 5 í lóg nr. 158 frá 6, mai 1980, verður sett í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan.

**Viðmerkingar:**
Eftir hesi lóg og samsvarandi lógum í hinum norðanlondum er tað gjørligt at viðurkenna og útinna avgerðir, ið eru gjørdar í øðrum norðanlondum. Úrskurðir og avgerðir, ið koma undir lógina, eru t.d. dómar, rættarsemjur, aðrar semjur og avgerðir tiknar av øðrum myndugleikum enn dómstólum. Útlegg og møgulig tvingsilssøla kann fara fram eftir hesum avgerðum, uttan at tær verða kannaðar av nýggjum.

Føroyskir advokatar hava víst á, at tørvur er á at fáa lógina setta í gildi í Føroyum, tá tann manglandi lýsingin av lógini í Føroyum hevur tað við sær, at dómar, sagdir av Føroya rætti, og sum lógin fevnir um, ikki kunnu fremjast á sama hátt, sum danskir dómar kunnu fremjast í hinum norðanlondum.

Sorinskrivarin, ið hevur havt málið til ummælis, mælir til, at lógin verður sett í gildi í Føroyum.

Í løgtingsmáli nr. 79/1982 góðkendi løgtingið, at §§ 1, 4 og 6 í lóg nr. 158 frá 6. mai 1980 »om anerkendelse af nordiske faderskabsaf-

gørelser og om ændring i lov om anerkendelse og fuldbyrdelse af nordiske afgørelser om privatretlige krav« verða settar í gildi í Føroyum.

Viðlagt fylgja serprent av lógini og lógarbroytingini.

1. viðgerð 17. november. Málið varð uttan orðaskifti beint í lógarnevndina, sum 9, mars legði fram soljóðandi

**Álit**
**í**

**løgtingsmáli nr. 21/1983: Lóg um viðurkenning av norðurlendskum avgerðum um privatrættarlig krøv.**

Málið varð framlagt av landsstýrinum tann 11. november 1983 og við 1. viðgerð 17. í sama mánaði í løganevndina.

Lógirnar samsvara við tilsvarandi lógir í hinum norðanlondunum og geva heimild til at útinna dómar og aðrar úrskurðir í hinum norðanlondunum.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

2. viðgerð 16. mars. Uppskotið samtykt við 31-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 501-12.

---

# 22. Landsstýrismál.

Ár 1983, hósdagin 17. november varð málið framlagt og beint í landsstýrismálanevndina, sum 8. mai 1984 legði fram soljóðandi

**Álit**

Landsstýrið hevur sent løgtinginum útskriftir úr gerðabók landsstýrisins fyri tíðarskeiðið 12. august 1982 til 25. juli 1983.

Málið varð beint til viðgerðar í landsstýrismálanevndini.

Í hesum tíðarskeiði hevur landsstýrið hildið umleið 75 fundir.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Flemming Mikkelsen og Arne Ziskasen) tekur undir við avgerðum landsstýrisins og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið góðtekur tær avgerðir, ið landsstýrið hevur tikið sambært útskriftir úr gerðabók fyri tíðarskeiðið 12. august 1982 til 25. juli 1983.

Minnilutin (Finnbogi Isaksen) ger ta viðmerking, at hann hevur neyvan nakrantíð fyrr lisið eina gerðabók hjá landsstýrinum við so soltnum innihaldi sum hendan, ið fevnir um tíðarskeiðið frá 12. august 1982 til 25. juli 1983.

Tað fyrsta árið, hetta landsstýrið sat, førdi tað gerðabókina gjølla — ja, har var eintá í góðari tíð frammanundan samtykt á landsstýrisfundi, nær teir ymisku landsstýrismenninir skuldu hava summarfrí.

Kanska er hendan gerðabókin so soltin, tí at hon ikki verður førd so gjølla longur. Kanska verður meira dult fyri tinginum nú enn tá. Men heldur man orsøkin vera, at har hevur einki verið at skriva, tí landsstýrið hevur verið óarbeiðsført vegna vantandi hugsjónir og vegna klandur.

Tað mesta av innihaldinum í hesi gerðabókini snýr seg um slík mál, sum als ikki áttu at verið viðgjørd á landsstýrisfundi. Serliga nógv mál viðvíkja kreppulánum, stuðulslánum og kurstapslánum til bátar og skip. Mangan er talan um heilt smá tøl og um heilt smáar broytingar.

Tínæst er tað Menningargrunnnurin, sum eigur tørn. Tá hesin grunnur varð stovnaður, varð avgjørt, at veitti hann lán størri enn 500.000 kr., skuldi landsstýrið góðkenna hetta. Í dag er ein hópur av lánum størri enn 500.000 krónur, og viðgerðirnar á landsstýrisfundi av lánveitingum úr Menningargrunninum eru tilsvarandi nógvar. Landsstýrið kundi havt spart nógva tíð og óneyðugan ómak við at ført lánsupphæddina, sum landsstýrið skal góðkenna, ajour.

Eisini fellur tað minnilutanum fyri bróstið, at setan av minni týðandi almennum størvum framvegis verða viðgjørd á landsstýrisfundi, summi teirra ferð eftir ferð. Henda skipan átti at verið broytt soleiðis, at landsstýrið bert setti leiðarastørv, og at stovnsleiðararnir so settu øll hini størvini. Henda skipan er m.a. galdandi fyri Postverkið og Telefonverkið.

Eitt mál, sum hevur verið viðgjørt fleiri ferðir í nevnda tíðarskeiði, er ráfiskagrunnurin, men tað hevur verið útsett hvørja ferð. Tað skilst av gerðabókini, at talan hevur verið um at gera eina nýggja lóg um grunnin, men einki sæst til, hvat innihaldið í uppskotinum ætlandi skuldi vera.

Hóast gerðabókin ikki goymir serliga spennandi upplýsingar, skal minnilutin draga nøkur mál fram, sum hann heldur hava løgtingsins áhuga:

Hóast gerðabókin ikki goymir serliga spennandi upplýsingar, skal minnilutin draga nøkur mál fram, sum hann heldur hava løgtingsins áhuga:

1) Á fundi 20. august 1982 samtykti landsstýrið, at landsstýrismaðurin í ídnaðarmálum (Pauli Ellefsen), formaðurin í búskaparráðnum og formaðurin í Føroya Ídnaðarfelag skuldu kanna og meta um týdningin av Føroya Ídnaðarstovu.

Tingið átti at fingið eina frágreiðing um úrslitið av kanningini.

2) Á sama fundi samtykti landsstýrið at góðkenna eitt tilmæli frá Skúlafyrisitingini um, at ein lærari skuldi fáa frí við løn at skriva lærubók um fiskivinnu.

Landsstýrismaðurin í mentamálum atkvøddi tó ímóti.

3) 30. august 1982 góðtók landsstýrið, at Byggeriets Realkreditfond skuldi kunna veita lán í Føroyum undir somu treytum sum Kreditforeningen Danmark.

Minnilutin metir, at júst lánveitingin frá Kreditforeningen Danmark hevði ta avleiðing, at ov mong og óneyðug stór og dýr handilshús til innflutning av vørum vórðu bygd, serliga í Havn. Tað kundi verið áhugavert at fingið at vita, hvussu lánveitingin frá Byggeriets Realkreditfond hevur verið, t.d. um hetta hevur økt uttanlandsskuldina uppaftur meir.

4) Í gerðabókini fyri 26. oktober 1982 stendur at lesa:

»Nýtsla av spardum peningi, nú heldur eingin løgmansveitsla var í 1982.

Løgmaður upplýsti, at hann aftur í ár vildi nýta pening, ið spardur var av ikki at halda løgmansveitslu, til góðgerandi endamál. Pening-

urin í 1982/83, kr. 45.000, skuldi latast Meginfelagi Teirra Brekaðu, fyrst og fremst sum stuðul til keyp av akfari til flutning av avlamnum.

Páll Vang tók til eftirtektar, at tað var løgmaður. ið ráddi yvir hesum peningi.«

5) Fyri fundin 4. november 1982 stendur:

»Løgmaður endaði fundin við at siga, at fleiri enn tey viðgjørdu málini vóru á skránni. Orsøkin til, at hesi ikki vórðu viðgjørd, er, at seinasti fundur í samgonguni hevur ført tað við sær, at tað ikki er møguligt at viðgera prinsipiell mál ella mál av størri týdningi.«

Hetta er ikki einastu ferð, at ósemjan innan samgonguna er skrivliga staðfest í gerðabókini. Á fundi 9. juni 1983 samtyktu løgmaður, Annfinn Kallsberg og Eilif Samuelsen at keypa eina tyrlu, »meðan Torbjørn Poulsen ikki atkvøddi fyri og segði, at verður málið avgreitt, áðrenn tað er viðgjørt á samgongufundi, fær tað parlamentariskar avleiðingar«.

Annars sæst allan vegin gjøgnum gerðabókiua, at menn hava verið ósamdir, tá atkvøtt hervur verið um ynisk — oftast smærri — mál.

6) 17. november 1982 varð samtykt, at tá loyvi skuldu gevast til sfla- og laksaaling, skuldi dentur verða lagdur á, at loyvini vórðu givin monnum ella feløgum, ið høvdu hesa vinnu sum høvuðsvinnu.

Minnilutin ivast í, um hetta hevur verið gjørt.

7) 13. januar 1983 varð samtykt, at »ætlan landsstýrisins viðvíkjandi útbyggingini av vinnuskúlunum í Tórshavn er, at útbyggingin av Handilsskúlanum skal gerast liðug fyrst, síðani útbyggingin av Maskinskúlanum og at enda byggingin av 2. byggistigi Tekniska Skúlans«.

Her tykist tað, sum at landsstýrið hert hevur ætlanir um bygging av vinnuskúlum í Havn. Undanfarin landsstýri høvdu ætlanir um at byggja handilsskúla á Kambsdali, tekniska skúla í Klaksvík og møguliga flyta maskinskúlan til Suðuroyar.

8) Sambært gerðabókina hevur landsstýrið tvær ferðir í hesum tíðarskeiði skulkað sær undan at avgreiða mál fyri løgtingið, hóast landsskrivstovan eisini er løgtingsins skrivstova.

4. mars 1983 svaraði landsstýrið nevndini, sum skal gera lógaruppskot um løgtingsins umboðsmann, at ongin skrivari var tøkur á landsskrivstovuni.

9. juni 1983 viðgjørdi landsstýrið løgtingssamtyktina um at kanna arbeiðsávísing og arbeiðsloysisstuðul. Samtykt varð at siga tinginum frá, at landsstýrið hevði ikki manning til hetta arbeiði ta fyrstu tíðina.

9) 4. mars samtykti landsstýrið eisini at veðhalda fyri 372.000 kr. til P/f Bil til at keypa ein buss til Bygdaleiðir.

Hevur landsstýrið heimild at veðhalda?

10) Fleiri ferðir hevur landsstýrið viðgjørt spurningin um samsýning til nevndarlimirnar í orkuráðnum.

Minnihutin heldur tað vera tíð uppá, at orkuráðið fær áhuga fyri øðrum enn sínum egnu samsýninguin.

11) 28. apríl 1983 varð samtykt at fara undir at krevja inn tann pening, sum landskassin hevur lagt út fyri skip og virki og eftirstøður av kurstapslánum og Luxemburg-láninum. Eisini varð samtykt at søkja figgjarnevndina um játtan at seta ein fulltrúa at røkja hesa uppgávu.

Tað kundi verið áhugavert at fingið at vita, hvat er hent í hesum máli.

— — —

Her eru nevnd nøkur dømi burtur úr einari lítið áhugaverdari gerðabók hjá landsstýrinum.
Minnilutin kann ikki mæla tinginum til at góðkenna gerðabókina.

2. viðgerð 8. mai. Atkvøðugreiðsla á seinri fundi. Uppskot til samtyktar frá meirilutanum samtykt við 17-1 atkvøðum.

F.L.j.nr. 204-2.

---

# 23. Eykafíggjarlóg fyri árið 1983/83.

Ár 1983, hósdagin 17. november legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**

# Eykafíggjarløgtingslóg fyri árið 1982/83
# Lagtingslov om tillægsbevilling for året 1982/83

| | Inntøkur<br>Indtægter | Fíggjarløg-løgtingslóg 1982/83<br>Finanslag-tingslov<br>kr.<br>(1.000) | Uppískoyt-isjáttan 1982/83<br>Tillægsbe-villing<br>kr.<br>(1.000) | Tilsamans<br>Ialt<br>kr.<br>(1.000) |
|---|---|---|---|---|
| **§ 1** | **Skattir**<br>**Skatter** | | | |
| 1108 | Vanligur skattur .....<br>Sædvanlig landsskat | 459.000 | 31.356,0 | 490.356,0 |
| 1507 | Sjómansskattur .....<br>Sømandsskat | 10.000 | 683,0 | 10.683,0 |
| 1703 | Rentuskattur .....<br>Renteskat | 7.000 | 1.647,4 | 8.647,4 |
| 1804 | Vegskattur .....<br>Vejskat | 12.000 | 249,3 | 12.249,3 |
| | | 488.000 | 33.935,7 | 521.935,7 |
| **§ 2** | **Toll- og framleiðslugjøld**<br>**Told- og fremstillingsafg.** | | | |
| 2017 | Tollgjøld .....<br>Toldafgifter | 444.000 | 40.955,2 | 484.955,2 |
| 2708 | Framleiðslugjøld .....<br>Fremstillingsafgift | 12.000 | 2.369,1 | 14.369,1 |
| | | 456.000 | 43.324,3 | 499.324,3 |
| **§ 3** | **Onnur gjøld**<br>**Andre udgifter** | | | |
| 3052 | Gjøld fyri spiritussmatanarkort<br>Afgifter for spiritusrationeringskort | 200 | ÷ 46,9 | 153,1 |
| 3102 | Loyvisgjøld .....<br>Afgifter for bevillinger | 60 | 18,3 | 78,3 |

| | | Fíggjarlog-løgtingslóg 1982/83 Finanslag-tingslov kr. (1.000) | Uppískoyt-isjáttan 1982/83 Tillægsbe-villing kr. (1.000) | Tilsamans lalt kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|
| 3204 | Arvagjøld ..... Arveafgifter | 300 | 580,0 | 880,0 |
| 3256 | Lestagjald ..... Skibsafgift | 40 | 15,3 | 55,3 |
| 3501 | Bøtur ..... Bøder | 10 | ÷ 7,0 | 3,0 |
| | | 610 | 559,7 | 1.169,7 |
| **§ 4** | **Inntøkur av spæli Indtægter ved spil** | | | |
| 4011 | Avlop av happadrátti ..... Overskud ved lotteri | 250 | 237,7 | 487,7 |
| 4058 | Gjøld við útgjalding av happadráttarvinningum .... | 60 | 42,2 | 102,2 |
| 4096 | Gjald av vinningum uttanlands ..... Afgifter af gevinster udenlands | 225 | 47,4 | 272,4 |
| | | 535 | 327,3 | 862,3 |
| **§ 5** | **Rentur og vinningsbýti v.m. Renter og udbytte m.m.** | | | |
| 5105 | Rentuinntøkur ..... Renteindtægter | 19.000 | ÷ 6.035,5 | 12.964,5 |
| 5207 | Rentuútreiðslur ..... Renteudgifter | ÷ 60.000 | 9.967,2 | ÷ 50.032,8 |
| | | ÷ 41.000 | 3.931,7 | ÷ 37.068,3 |

| | | Fíggjarløg-løgtingslóg 1982/83 Finanslov-tingslov kr. (1.000) | Uppískoyt-isjáttan 1982/83 Tillægsbe-villing kr. (1.000) | Tilsamans talt kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|
| **§ 6** | **Landsstovnar Landsvirksomheder** | | | |
| 6014 | Strandfaraskip Landsins .... Lagtingets kystfart | ÷28.000 | 9.821,0 | ÷18.179,0 |
| 6028 | Strandferðslan/Postverkið .. Kystfarten/Postvæsenet | 0 | ÷1.697,1 | ÷1.697,1 |
| 6033 | Bussruta Tórshavn-Kirkjubø o.a..... Busrute Torshavn-Kirkjubø m.m. | ÷2.551 | ÷492,5 | ÷3.043,5 |
| 6102 | Tjaldurs Apotek ..... Tjaldurs Apotek | 610 | 222,5 | 832,5 |
| 6204 | Telefonverkið ..... Telefonværket | 2.716 | ÷17.796,0 | ÷15.080,0 |
| 6306 | Útvarpið ..... Radiofonien | 306 | ÷ 3.894,6 | ÷3.588,6 |
| 6358 | Postverkið ..... Postvæsenet | ÷3.000 | ÷900,0 | ÷3.900,0 |
| 6408 | Oljugoymslur ..... Olieanlæg | 696 | 132,9 | 828,9 |
| 6567 | Hvalastøðin við Áir ..... Hvalstation við Áir | ÷20 | ÷37,0 | ÷57,0 |
| 6572 | Stórahús við Áir ..... Det store hus ved Áir | ÷66 | 4,1 | ÷61,9 |
| | | ÷29.309 | ÷14.636,7 | ÷43.945,7 |
| **§ 7** | **Partur av avlopi danska tjóðbankans sbrt. lóg Andel i den danske nationalbanks overskud ifølge lov** | | | |
| 7011 | Partur av avlopi danska tjóðbankans sbrt. lóg ..... Andel i den danske Nationalbanks overskud iflg. lov | 2.500 | 16.696,1 | 19.196,1 |
| | | 2.500 | 16.696,1 | 19.196,1 |

| | | Fíggjarløg-løgtingslóg 1982/83 Finanslag-tingslov kr. (1.000) | Uppískoyt-isjáttan 1982/83 Tillægsbe-villing kr. (1.000) | Tilsamaus lalt kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|
| **§ 8** | **Ymsar inntøkur**<br>**Diverse indtægter** | | | |
| 0510 | Ymsar inntøkur ..... | 5 | ÷1,8 | 3,2 |
| | Diverse indtægter | | | |
| | Samanløgd inntøka<br>Samlede indtægter | 877.341 | 84.136,3 | 961.477,3 |
| | **Útreiðslur**<br>**Udgifter** | | | |
| **§ 10** | **Løgtingið**<br>**Lagtinget** | | | |
| 10018 | Løgtingsmenn ..... | 5.441 | 455,7 | 5.896,7 |
| | Lagtingets medlemmer | | | |
| 10106 | Løgting ..... | 465 | ÷85,7 | 379,3 |
| | Lagtingsbygning | | | |
| 10208 | Løgtingstíðindi og<br>Kunngerðarsavn ..... | 537 | ÷80,2 | 456,8 |
| | Lagtingstidende og<br>kundgørelsessamling | | | |
| 10301 | Grannskoðan (extern) ..... | 70 | ÷26,3 | 43,7 |
| | Revision (extern) | | | |
| 10403 | Grannskoðan (intern) ..... | 1.049 | 48,5 | 1.097,5 |
| | revision (intern) | | | |
| 10505 | Landsskattanevnd ..... | 108 | ÷12,1 | 95,9 |
| | Landsskatteudvalg | | | |
| 10607 | Norrønt Ráð ..... | 60 | 71,3 | 131,3 |
| | Nordisk Råd | | | |
| 10709 | Norrønt samstarv ..... | 0 | 6,9 | 6,9 |
| | Nordisk samarbejde | | | |
| | | 7.730 | 378,1 | 8.108,1 |
| **§ 11** | **Landsfyrisitingin**<br>**Landsadministrationen** | | | |
| 11015 | Løgmaður og landsstýri | 1.515 | ÷65,8 | 1.449,2 |
| | Lagmand og Landsstyre | | | |

| | | Fíggjarløg-løgtingslóg 1982/83 Finanslag-tingsluv kr. (1.000) | Uppískoyt-isjáttan 1982/83 Tillægsbe-villing kr. (1.000) | Tilsamans Ialt kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|
| 11053 | Landsskrivstova ..... Landskontor | 5.252 | 368,7 | 5.620,7 |
| 11103 | Fiskivinnustova ..... Fiskerikontor | 655 | 51,5 | 706,5 |
| 11155 | Uttanríkistænasta í Aberdeen ..... Udenrigstjeneste i Aberdeen | 374 | 52,8 | 426,8 |
| 11205 | Uttanríkistænasta í København ..... Udenrigstjeneste i København | 460 | 147,8 | 607,8 |
| 11257 | Líkningarráð ..... Ligningsråd | 3.084 | 396,1 | 3.480,1 |
| 11307 | Manntalsstova ..... Folkeregister | 868 | 53,3 | 921,3 |
| 11359 | Almannastova ..... Socialforvaltning | 3.714 | ÷35,7 | 3.678,3 |
| 11409 | Landsskúlafyrisitingin ..... Landsskoleadministration | 5.440 | ÷525,2 | 4.914,8 |
| 11452 | Gjaldstova ..... Oppebørselskontor | 12.003 | 3.126,9 | 15.129,9 |
| 11466 | Gjaldstovudeild í Klaksvík .. Oppebørselskontor i Klaksvik | 635 | 19,8 | 654,8 |
| 11471 | Gjaldstovudeild í Saltangará Oppebørselsfilial i Saltangará | 500 | ÷29,9 | 470,1 |
| 11485 | Gjaldstovudeild í Fuglafirði Oppebørselsfilial i Fuglafirði | 345 | 40,4 | 385,4 |
| 11499 | Gjaldstovudeild á Tvøroyri . Oppebørselsfilial i Tvøroyri | 465 | ÷7,9 | 457,1 |
| 11502 | Gjaldstovudeild í Vági ..... Oppebørselsfilial í Vági | 339 | 29,9 | 368,9 |
| 11516 | Gjaldstovudeild í Sørvági ... Oppebørselsfilial í Sørvági | 322 | ÷6,7 | 315,3 |

| | | Fíggjarløg-løgtingslóg 1982/83 Finanslag-tingslov kr. (1.000) | Uppiskoyt-isjáttan 1982/83 Tillægsbe-villing kr. (1.000) | Tilsamans lalt kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|
| 11549 | Endurgjald til sýslurnar fyri skrivstovuhald ..... Kontorgodtgørelse til syslerne | 40 | 10,9 | 50,9 |
| 11554 | Tolleftirlit ..... Toldvæsen | 2.661 | ÷104,5 | 2.556,5 |
| 11568 | Trygdareftirlit ..... Sikkerhedstilsyn | 500 | ÷359,4 | 140,6 |
| 11604 | Valuta- og Prísráð ..... Valuta- og Prisråd | 860 | ÷183,1 | 676,9 |
| 11656 | Lønarráð ..... Lønningsråd | 6 | ÷2,3 | 3,7 |
| 11661 | Heilsu- og heimasjúkra-systraumsitingin ..... Sundheds- og hjemmesyge-plejeadministrationen | 0 | 294,8 | 294,8 |
| 11706 | Búskaparráð ..... Økonomisk Råd | 1.753 | ÷157,4 | 1.595,6 |
| 11758 | Ferða- og dagpeningur innan- og uttanlands ..... Rejse- og dagpenge inden- og udenlands | 1.750 | 499,5 | 2.249,5 |
| 11808 | Innheintingarútreiðslur ..... Udgifter ved inkasso | 50 | ÷5,0 | 45,0 |
| 11851 | Ognin Tinganes ..... Ejendommen Tinganes | 1.274 | ÷89,4 | 1.184,6 |
| 11901 | Landsverkfrøðingsskriv-stovan ..... Landsingeniørkontor | 7.100 | ÷705,3 | 6.394,7 |
| 11953 | Umsitingarhús í grunn ..... Administrationsbygning henlagt i fond | 1.000 | 0,0 | 1.000,0 |
| | | 52.965 | 2.814,8 | 55.779,8 |

| | | Fíggjarlóg-løgtingslóg 1982/83 Finanslag-tingslov kr. (1.000) | Uppiskoyt-isjáttan 1982/83 Tillægshe-villing kr. (1.000) | Tilsamans talt kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|
| **§ 12** | **Heilsumál**<br>**Sundhedsvæsen** | | | |
| 12109 | Landssjúkrahúsið (D.A.H.) . .<br>Landssygehuset (D.A.H.) | 50.831 | 1.900,0 | 52.731,0 |
| 12201 | Klaksvíkar sjúkrahús . . . . . .<br>Klaksvík sygehus | 12.407 | 870,0 | 13.277,0 |
| 12304 | Suðuroyar sjúkrahús<br>Suðuroyar sygehus | 5.986 | 352,9 | 6.338,9 |
| 12406 | Heilsumiðstøðir í grunn . . . . .<br>Sundhedscentre, henl. i fond | 1.000 | 0,0 | 1.000,0 |
| 12508 | Læknar . . . . . .<br>Læger | 464 | ÷7,2 | 456,8 |
| 12601 | Ljósmøður . . . . . .<br>Jordemødre | 488 | 87,5 | 575,5 |
| 12653 | Heimasjúkrasystraskipan . . . .<br>Hjemmesygeplejeordning | 1.046 | 381,3 | 1.427,3 |
| 12672 | Skúlalæknar . . . . . .<br>Skolelæger | 0 | 34,6 | 34,6 |
| 12672 | Ymiskar útreiðslur . . . . . .<br>Diverse udgifter | 401 | 17,1 | 418,1 |
| | | 72.623 | 3.636,2 | 76.259,2 |
| **§ 13** | **Samferðslumál**<br>**Kommunikationsvæsen** | | | |
| | Nýggir vegir og brýr, breiðkan av brúm og umsiting av vegum . . . . . .<br>Nye veje og broer, udvidelse af broer og vedligeholdelse af veje | 51.300 | ÷133,0 | 51.167,0 |
| 13023 | Havnagerð í grunn . . . . . .<br>Havnebygning, henl. i fond | 40.000 | 0,0 | 40.000,0 |
| 13037 | Lendingar í grunn . . . . . .<br>Landingspladser henl. i fond | 24.700 | 0,0 | 24.700,0 |

| | | Fíggjartøg-løgtingslóg 1982/83 Finanslag-tingslov kr. (1.000) | Uppiskoyt-isjáttan 1982/83 Tillægsbe-villing kr. (1.000) | Tilsamans Ialt kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|
| 13042 | Flogferðsla í grunn ..... Flytrafik henl. i fond | 2.500 | 0,0 | 2.500,0 |
| 13061 | Berghols- og brúgvagerð í grunn ..... Tunnel- og brobygning henl. i fond | 6.000 | 0,0 | 6.000,0 |
| 13075 | Studningur til kommunur til asfaltering í grunn ..... Tilskud til kommuner til asfaltering, henl. i fond | 6.500 | 0,0 | 6.500,0 |
| 13089 | Byggi- og rakstrargrunnur Postverksins ..... Postvæsenets bygge- og driftsfond | 5.000 | 900,0 | 5.900,0 |
| 13094 | Sekunder berghol ..... sekundære tuneller | 5.000 | 0,0 | 5.000,0 |
| | | 141.000 | 767,0 | 141.767,0 |
| **§ 14** | **Skúlamál Undervisningsvæsen** | | | |
| 14053 | Felagsútreiðslur fyri skúla-verkið ..... Fællesudgifter for skolevæ-senet | 338 | ÷172,3 | 165,7 |
| 14103 | Fólkaskúlin ..... Folkeskolen | 41.675 | 1.474,0 | 43.149,0 |
| 14155 | HF-skeið í Suðuroy ..... HF-kursus i Suðuroy | 2.437 | 158,4 | 2.595,4 |
| 14174 | HF-skeið í Klaksvík og Gøtu . HF-kursus i Klaksvík og Gøta | 3.893 | 2.273,9 | 6.166,9 |
| 14205 | Studentaskúli ..... Gymnasium | 12.916 | 696,7 | 13.612,7 |
| 14257 | Kostdeild studentaskúlans ... Studenterskolens kostafdeling | 1.529 | 71,1 | 1.600,1 |

| | | Figgjarløg-løgtingslóg 1982/83 Finanslagtingslov kr. (1.000) | Uppískoyt-isjáttan 1982/83 Tillægsbevilling kr. (1.000) | Tilsamans Ialt kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|
| 14307 | Føroya Sjómansskúli ..... Færøernes Navigationsskole | 4.140 | 72,0 | 4.212,0 |
| 14409 | Klaksvíkar sjómansskúli .... Klaksvik Navigationsskole | 1.355 | ÷291,1 | 1.063,9 |
| 14502 | Føroya Fólkahákúli ..... Færøernes Folkehøjskole | 1.318 | 123,6 | 1.441,6 |
| 14554 | Húshaldsskúlar ..... Husholdningsskoler | 523 | 3,6 | 526,6 |
| 14604 | Kvøldskúlar ..... Aftenskoler | 1.365 | ÷325,5 | 1.039,5 |
| 14901 | Ítrótt Idræt | | | |
| 313103 | Lánsgrunnur til ítróttaranlegg ..... Lånefond til idrætsanlæg | 100 | 0,0 | 100,0 |
| 313128 | Studningur til Í.S.F. .. Tilskud til Í.S.F. | 1.000 | 0,0 | 1.000,0 |
| 313136 | Studningur til ferðir innanoyggja ..... Tilskud til indenlands rejser | 450 | 560,8 | 1.010,8 |
| 14953 | Ymiskur studningur ..... Diverse tilskud | 6.667 | ÷39,9 | 6.627,1 |
| | | 79.706 | 4.605,3 | 84.311,3 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **§ 15** | **Vísindi, bókmentir og list Videnskab, litteratur og kunst** | | | |
| 15109 | Landsbókasavn ..... Landsbibliotek | 2.221 | ÷43,6 | 2.177,4 |
| 15202 | Fólkabókasøvn ..... Folkebiblioteker | 2.527 | ÷274,9 | 2.252.1 |

| | | Figgjarløg-løgtingslóg 1982/83 Finanslag-tingslov kr. (1.000) | Uppískoyt-isjáttan 1982/83 Tillægsbe-villing kr. (1.000) | Tilsamans Ialt kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|
| 15304 | Landsskjalasavn ..... Landsarkiv | 789 | ÷60,6 | 728,4 |
| 15406 | Føroya Fornminnissavn..... Færøernes Museum | 2.740 | ÷82,8 | 2.657,2 |
| 15508 | Bygdasøvn ..... Bygdemuseer | 150 | ÷8,0 | 142,0 |
| 15551 | Fiskirannsóknarstovan ..... Fiskeribiologisk laboratorium | 6.670 | ÷292,2 | 6.377,7 |
| 15653 | Fuglakanningarstøð v.m. ... Ornitologisk station m.v. | 18 | 14,8 | 32,8 |
| 15703 | Náttúrugripasavn ..... Naturhistorisk samling | 994 | 21,4 | 1.015,4 |
| 15717 | DGU ..... | 310 | 57,2 | 367,2 |
| 15722 | Jarðfrøðiligar boringar ..... Geologiske boringer | 0 | 109,5 | 109,5 |
| 15755 | Fróðskaparsetur Føroya .... Færøernes Akademi | 4.145 | ÷34,5 | 4.110,5 |
| 15793 | Stovnar á Debesartrøð ..... Institutioner på Debesartrøð | 1.068 | ÷117,8 | 950,2 |
| 15805 | Heilsufrøðilig Starvstova ... Hygiejnisk laboratorium | 1.407 | 34,8 | 1.372,2 |
| 15857 | Náttúrufriðingarnevndir .... Naturfredningsudvalg | 80 | 150,4 | 230,4 |
| 15895 | Sangur og tónleikur ..... Sang og musik | 600 | ÷48,6 | 551,4 |
| 15907 | Ymiskir studningar..... Diverse tilskud | 5.059 | 3.486,1 | 8.545,1 |
| | | 28.778 | 2.841,6 | 31.619,6 |
| **§ 16** | **Fiskivinna, sigling o.t. Fiskeri, søfart o.l.** | | | |
| 16018 | Vrakarastovnur ..... Vragerinstitution | 1.686 | 29,1 | 1.715,1 |

| | | Fíggjarløg-Løgtingslóg 1982/83 Finanslag-tingslov kr. (1.000) | Uppiskoyt-isjáttan 1982/83 Tillægsbe-villing kr. (1.000) | Tilsamans Ialt kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|
| 16106 | Nautiskt Royndarkamar .... Nautisk Prøvekammer | 35 | ÷2,6 | 32,4 |
| 16208 | Sjómansheim ..... Sømandshjem | 140 | 0,5 | 140,5 |
| 16301 | Vaktar- og bjargingarskip ... Vagt- og bjærgningsskib | ÷26,5 | ÷68,0 | ÷94,5 |
| 16315 | Vaktarskipið »Tjaldur« .... Vagtskibet »Tjaldur« | 6.580 | ÷417,8 | 6.162,2 |
| 16334 | Vaktarskipið»Ólavur Halgi« Vagtskibet »Ólavur Halgi« | 6.374,5 | 130,7 | 6.478,2 |
| 16403 | Laksa- og sílaaling ..... Laks- og ørreddrift | 800 | ÷240,3 | 559,7 |
| 16505 | Prísásetingarnevndin fyri salt- og ráfisk ..... Prisudvalget salt- og råfisk | 100 | 10,3 | 110,3 |
| 16607 | Fiskivinnuráðið ..... Fiskerirådet | 223 | ÷56,1 | 166,9 |
| 16904 | Aðrir studningar Andre tilskud | | | |
| 333017 | Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna ..... Mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet | 203.000 | 24.402,8 | 227.402,8 |
| 333025 | Studningur til grunnin til endurnýgging av skipaflot-anum ..... Tilskud til fonden til fisker-flådens fornyelse | 12.000 | 0,0 | 12.000,0 |
| 333033 | Grindir ..... Grindefangst | 25 | 21,5 | 46,5 |
| 333041 | Fiskivinna á fremmandum høvum ..... Fiskeri på fremmede have | 0 | 35,3 | 35,3 |

| | | Fíggjarløg-løgtingslóg 1982/83 Finanslagtingslov kr. (1.000) | Uppískoyti-sjáttan 1982/83 Tillægsbevilling kr. (1.000) | Tilsamans Ialt kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|
| 333066 | Havrannsóknarskip í grunn<br>Havundersøgelsesskib henl. i fond | 400 | 0,0 | 400,0 |
| 333074 | Praktiskar fiskiroyndir ....<br>Praktiske fiskeriforsøg | 5.500 | 83,4 | 5.583,4 |
| 333082 | Vaktarskip í grunn .....<br>Vagtskib, henl. i fond | 100 | 0,0 | 100,0 |
| 333099 | Útróðrarstøðir í grunn ....<br>Hjemmefiskeristationer henl. i fond | 1.000 | 0,0 | 1.000,0 |
| 333104 | Trygdargrunnur veiðumanna .....<br>Fiskernes garantifond | 200 | 154,7 | 354,7 |
| 373305 | Viðvíkjandi serlánum Landsstýrinum at ráða yvir<br>Landsstyret at råde over | 100 | 66,3 | 166,3 |
| | | 238.210 | 24.149,8 | 262.359,8 |
| **§ 17** | **Landbúnaður og matrikulering**<br>**Landbrug og matrikulering** | | | |
| 17015 | Landsdjóralæknaembætið<br>Landsdyrelægeembedet | 508 | 53,7 | 561,7 |
| 17048 | Landbúnaðarráðgevari ....<br>Landbrugskonsulent | 244 | 2,4 | 246,4 |
| 17053 | Seyðaráðgevari og seyðaroyndir .....<br>Fåreavlskonsulent og fåreavlsforsøg | 119 | 0,0 | 119,0 |
| 17103 | Útskifting og matrikulstova<br>Udskiftning og matrikelkontor | 3.939 | 172,5 | 4.111,5 |

| | | Fíggjarlóg-løgtingslóg 1982/83 Finanslag-tingslov kr. (1.000) | Uppiskoyt-isjáttan 1982/83 Tillægsbe-villing kr. (1.000) | Tilsamans Ialt kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|
| 17205 | Royndarstøðin í Hoyvík ... Forsøgsstationen i Hoyvík | 1.437 | 80,8 | 1.517,8 |
| 17901 | Aðrir studningar ..... Andre tilskud | 15.005 | 70,6 | 15.075,6 |
| | | 21.252 | 380,0 | 21.632,0 |
| § 18 | **Handil, ídnaður o.l. Handel, industri m.v.** | | | |
| 18109 | Arbeiðseftirlit ..... Arbejdstilsyn | 1.026 | 45,6 | 1.071,6 |
| 18152 | Brandvenjingarstøðin við Áir ..... Brandøvelsesstationen vid Áir | 416 | 3,3 | 419,3 |
| 18202 | Bileftirlit ..... Biltilsyn | 1.724 | ÷709,0 | 1.015,0 |
| 18216 | Radioeftirlit ..... Radiotilsyn | 250 | ÷50,3 | 199,7 |
| 18235 | Ráðið fyri ferðslutrygd .... Rådet for færdselssikkerhed | 250 | 0,0 | 250,0 |
| 18268 | Filmseftirlit ..... Filmstilsyn | 135 | 4,6 | 139,6 |
| 18304 | Skipaskrá- og uppmáting .. Skibsregistrering- og opmåling | 25 | 61,1 | 86,1 |
| 18318 | Semingsmannaskipanin ... Forligsinstitution | 51 | ÷10,9 | 40,1 |
| 18323 | Kolagrevstur ..... Kulbrydning | 700 | 128,6 | 828.6 |
| 18337 | Læruráðið ..... Lærerådet | 286 | ÷131,1 | 154,9 |
| 18342 | Skeiðvirksemi ..... Kursusvirksomhed | 115 | ÷15,7 | 99,3 |

| | | Fíggjarlog-fogtingslóg 1982/83 Finanslag-tingslov kr. (1.000) | Uppiskoyt-isjáttan 1982/83 Tillægsbe-villing kr. (1.000) | Tilsamans Alt kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|
| 18907 | Aðrir studningar ..... Diverse tilskud | | | |
| 3501 | Føroya Ferðamannfelag ..... Færøernes Turistforening | 200 | 0,0 | 200,0 |
| 353026 | Stuðul til ídnaðarfremjandi endamál Støtte til industrifremmende formål | 3.500 | 25,0 | 3.525,0 |
| 353034 | At leggja í gistingarhúsgrunnin ..... Henlæggelse i hotelfonden | 600 | 0,0 | 600,0 |
| 353042 | Til menningargrunn Til udviklingsfond | 8.000 | 0,0 | 8.000,0 |
| 353067 | Studningur til meistarar ..... Tilskud til mestre | 2.000 | 28,0 | 2.028,0 |
| 353083 | Til orkugrunn .... Til energifond | 9.000 | 0,0 | 9.000,0 |
| 373305 | Landsstýrinum at ráða yvir Landsstyret at råde over | 275 | ÷58,5 | 216,5 |
| | | 28.553 | ÷679,3 | 27.873,7 |
| **§ 19** | **Almenn forsorg v.m. Socialvæsen m.v.** | | | |
| 19056 | Fólkapensjón ..... Folkepension | 69.500 | ÷1.599,7 | 67.900,3 |
| 19106 | Avlamispensjón ..... Invalidepension | 23.750 | 1.368,0 | 25.118,0 |
| 19208 | Barnastyrkur til stakar uppihaldarar ..... Børnebidrag til enlige forsørgere | 1.475 | ÷126,0 | 1.349,0 |

| | | Fíggjarlog-lagtingslóg 1982/83 Finanslag-tingslov kr. (1.000) | Uppískoyt-isjáttan 1982/83 Tillægsbe-villing kr. (1.000) | Tilsamans Ialt kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|
| 19301 | Einkjupensjón ..... Enkepension | 2.565 | ÷283,7 | 2.281,3 |
| 19403 | Vanlig forsorg ..... Almindelig forsorg | 2.415 | 269,4 | 2.684,4 |
| 19455 | Víðkað hjálp ..... Udvidet hjælp | 1.110 | 726,4 | 1.836,4 |
| 19505 | Einkjuhjálp ..... Enkehjælp | 2.960 | 228,4 | 3.188,4 |
| 19557 | Barnaforsorg ..... Børneforsorg | 3.095 | 587,6 | 3.682,6 |
| 19607 | Umsiting av heimahjálpar-skipanini ..... Administration af hjemme-hjælpsordningen | 13.000 | 1.145,2 | 14.145,2 |
| 19659 | Dagpengaskipanin ..... Dagpengeordningen | 8.785 | 1.773,0 | 10.558,0 |
| 19664 | Bjálving av húsum hjá pen-sjónistum ..... Isolering af pensionisters huse | 3.000 | 0,0 | 3.000,0 |
| 2875 | Brennistudningur til pen-sjónistar ..... Brændselstilskud til pensio-nister | 3.500 | 170,8 | 3.670,8 |
| 2890 | Ymsir studningar ..... Forskellige tilskud | 16.610 | ÷277,2 | 16.332,8 |
| 19918 | Skúlin á Trøðni..... | 2.112 | 646,9 | 2.758,9 |
| | | 153.877 | 4.629,1 | 158.506,1 |

| | | Fíggjarlog-løgtingslóg 1982/83 Finanslagtingslov kr. (1.000) | Uppiskoyt-isjáttan 1982/83 Tillægsbevilling kr. (1.000) | Tilsamans falt kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|
| **§ 20** | **Pensjónsútreiðslur Pensionsudgifter** | | | |
| 20013 | Pensjónsútreiðslur Pensionsudgifter | | | |
| 103558 | Eftirlønir ..... Pensioner | 740 | ÷68,3 | 671,7 |
| 103612 | Bíðipeningur ..... Ventepenge | 1.455 | ÷82,5 | 1.372,5 |
| 103629 | Tænastumannaeft-eftirlønir ..... Tjenestemandspensioner | 1.499 | ÷105,8 | 1.393,2 |
| | | 3.694 | ÷256,6 | 3.437,4 |
| **§ 21** | **Effektivar veðbaldsbindingar í grunn Effektive garantiforpligtelser i fond** | | | |
| 21019 | Effektivar vehaldsbindingar í grunn ..... Effektive garantiforpligtelser i fond | 6.000 | 0,0 | 6.000 |
| | | 6.000 | 0,0 | 6.000 |
| **§ 22** | **Aðrar og óvissar útreiðslur Andre og uvisse udgifter** | | | |
| 22104 | Aðrar og óvissar útreiðslur Andre og uvisse udgifter | | | |
| 203507 | Umboðan ..... Repræsentation | 300 | 227,3 | 527,3 |
| 253704 | Útreipslur av vali .. Udgifter vedrørende valg | 50 | ÷35,1 | 14,9 |
| 253753 | Dóms- og løgreglumál ..... Retsvæsen og politi | 20 | ÷16,5 | 3,5 |

| | | Fíggjarløg-løgtingslóg 1982/83 Finansslag-tingslov kr. (1.000) | Uppiskoyt-isjáttan 1982/83 Tillægsbe-villing kr. (1.000) | Tilsamans Ialt kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|
| 253808 | Studningur til politiskt upplýsingararbeiði v.m. ..... Tilskud til politisk oplysningsarbejde m.m. | 740 | 0,0 | 740,0 |
| 3730 | Landsstýrinum at ráða yvir Landsstyret at råde over | 350 | 13,8 | 363,8 |
| | | 1.460 | 189,5 | 1.649,5 |
| **§ 23** | **At leggja í ymsar grunnar v.m.** | | | |
| 23203 | **Henlægges til forskellige fonds m.m.** | | | |
| 383015 | Avlopið hjá apotekinum lagt í apoteksgrunnin ..... Apotekets overskud henlagt til apotekfonden | 610 | 222,5 | 832,5 |
| 383056 | Avlopið hjá telefonverkinum ..... Telefonværkets overskud | 2.716 | ÷17.796,0 | ÷15.080,0 |
| 383064 | Avlop hjá postverki Føroya Postvæsenets overskud | ÷3.000 | ÷900,0 | ÷3.900,0 |
| 383102 | Avlopið hjá útvarpinum ... Radiofoniens overskud | 306 | ÷3.894,6 | ÷3.588,6 |
| 383151 | Til kirkjugrunnin ..... Til kirkefonden | 2.020 | 0,0 | 2.020,0 |
| | | 2.652 | ÷22.368,1 | ÷19.716,1 |

| | | Fíggjarlog-løgtingslóg 1982/83 Finanslag-tingslov kr. (1.000) | Uppískoyt-isjáttan 1982/83 Tillægsbe-villing kr. (1.000) | Tilsamans falt kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|
| § 24 | **Burturleggingar til avdráttir av lánum<br>Henlæggelser til afdrag på lån** | | | |
| 24302 | Burturleggingar til avdráttir av lánum ..... | 0 | 0,0 | 0,0 |
| | Henlæggelser til afdrag på lån | | | |
| | | 0 | 0,0 | 0,0 |
| § 25 | **Avskrivingar<br>afskrivninger** | | | |
| 25401 | Avskrivingar ..... | 37.700 | 15.818,8 | 53.518,8 |
| | Afskrivninger | | | |
| | | 37.700 | 15.818,8 | 53.518,8 |
| § 26 | **Ymsar ognarútreiðslur<br>Diverse ejendomsudgifter** | | | |
| 26305 | Ymsar ognarútreiðslur (kt. 1330 § 11) ..... | 150 | ÷79,5 | 70,5 |
| | Diverse ejendomsudgifter | | | |
| | Samanlagdar útreiðslur .... | 876.350 | 36.826,7 | 913.176,7 |
| | Udgifter ialt | | | |
| | Munur ..... | 991 | 47.309,6 | 48.300,6 |
| | Difference | | | |
| | | 877.341 | 84.136,3 | 961.477,3 |

**Útreiðslurnar undir teimum einstøku útreiðslugreinunum hava verið fylgjandi:**

| | | Játtan (1.000 kr.) | Meirútreiðslur (1.000 kr.) | Útreiðslur tilsamans (1.000 kr.) |
|---|---|---|---|---|
| § 10 | Løgtingið | 7.730 | 378,1 | 8.108,1 |
| § 11 | Landsumsitingin | 52.965 | 2.814,8 | 55.779,8 |
| § 12 | Heilsumál | 72.623 | 3.636,2 | 76.259,2 |
| § 13 | Samferðslumál | 141.000 | 767,0 | 141.767,0 |
| § 14 | Skúlamál | 79.706 | 4.605,3 | 84.311,3 |
| § 15 | Vísindi, bókmentir og list | 28.778 | 2.841,6 | 31.619,6 |
| § 16 | Fiskivinna, sigling o.t. | 238.210 | 24.149,8 | 262.359,8 |
| § 17 | Landbúnaður og matrikulering | 21.252 | 380,0 | 21.632,0 |
| § 18 | Handil, ídnaður o.t. | 28.553 | ÷679,3 | 27.873,7 |
| § 19 | Almenn forsorg v.m. | 153.877 | 4.629,1 | 158.506,1 |
| § 20 | Pensjónsútreiðslur | 3.694 | ÷256,6 | 3.437,4 |
| § 21 | Effektivar vehaldsbindingar í gr. | 6.000 | 0,0 | 6.000,0 |
| § 22 | Aðrar og óvissar útreiðslur | 1.460 | 189,5 | 1.649,5 |
| § 23 | At leggja í ymsar grunnar v.m. | 2.652 | ÷22.368,1 | ÷19.716,1 |
| § 24 | Burturlegging til avdr. av lánum | 0 | 0,0 | 0,0 |
| § 25 | Avskrivingar | 37.700 | 15.818,8 | 53.518,8 |
| § 26 | Ymsar ognarútreiðslur | 150 | ÷79,5 | 70,5 |
| | | 876.350 | 36.826,7 | 913.176,7 |

**Viðmerkingar:**

Landsstýrið leggur við hesum fyri løgtingið uppskot til eykafíggjarløgtingslóg fyri fíggjarárið 1982/83.

Við uppskoti til eykafíggjarlóg søkir landsstýrið tingsins játtan til inntøkur og útreiðslur, ið verið hava í fíggjarárinum, men sum av ymsum orsøkum ikki hava verið játtaðar á fíggjarlógini.

Talan er um

1. Inntøkur, ið standast av broytingum í lógum, sum eru komnar í gildi aftan á samtykt fíggjarlógarinnar, og/ella sum ikki vórðu lagdar til grund fyri tølini á fíggjarlógini.

2. Útreiðslur, ið standast av broytingum í lógum, sum eru komnar í gildi aftan á samtykt fíggjarlógarinnar, og/ella sum ikki vórðu lagdar til grund fyri tølini á fíggjarlógini.
3. Útreiðslur, ið hvørki høvdu heimild í fíggjarlógini ella í øðrum lógum, men sum hava fingið fyribils játtan fíggjarnevndarinnar.
4. Inntøkur, ið standast av broyttum inntøkugrundarlagi í mun til tað, ið lagt varð til grund fyri inntøkumetingarnar á fíggjarlógini ella av, at tað ikki hevur verið mett rætt, tá ið fíggjarlógin varð gjørd.
5. Útreiðslur, ið standast av, at prís- og lønargongdin hevur verið ein onnur enn tann, ið varð løgd til grund fyri tølini á fíggjarlógini.
6. Útreiðslur, ið standast av, at onnur viðurskifti enn prís- og lønargongdin hava verið annarsleiðis enn tey, ið løgd vórðu til grund fyri tølini á fíggjarlógini.

Á fíggjarlógini 1982/83 vóru inntøkurnar settar til 877.341.000 kr. Sambært uppskotið til eykafíggjarlóg eiga inntøkurnar at verða settar 84.136.300 kr. hægri, soleiðis at samlaðu inntøkurnar fyri fíggjarárið 1982/83 verða 961.477.300 kr.

Á fíggjarlógini 1982/83 vóru útreiðslurnar settar til 876.350.000 kr. Sambært uppskotið til eykafíggjarlóg eru útreiðslurnar 36.826,700 kr. hægri, soleiðis at samlaðu útreiðslurnar í fíggjarárinum 1982/83 verða 913.176.700 kr.

Á fíggjarlógini 1982/83 vórðu inntøkurnar settar 991.000 kr. hægri enn útreiðslurnar. Hetta avlop verður sambært evkafíggjarlógaruppskotið at skula hækkast við 47.309.600 kr. upp í 48.300.600 kr.

Hækkingin í mun til fíggjarlógina 1982/83 er á inntøkusíðuni 9,6 % og á útreiðslusíðuni 3,9 %. Hækkingin í inntøkunum er ikki nógv øðrvísi enn á undanfarnum eykafíggjarlógum, men hækkingin í útreiðslunum er munandi minni enn áður.

Samanbera vit soleiðis inntøkur og útreiðslur á eykafíggjarlógini við somu tøl á fíggjarlógini seinastu 5 fíggjarárini, fáa vit:

| | Inntøkur | Útreiðslur |
|---|---|---|
| 1982/83 | + 9,6% | + 3,9% |
| 1981/82 | + 12,8% | + 9,9% |
| 1980/81 | + 2,9% | + 6,4% |
| 1979/80 | + 10,4% | + 14,2% |
| 1978/79 | + 11,7% | + 12,4% |

Hetta stendst av, at landsstýrið við fíggjarlógini fyri 1982/83 skifti mannagongd og legði seg eftir at fáa eina realistiska fíggjarlóg bæði á inntøku- og útreiðslusíðuni.

Inntøkurnar vóru kortini mettar við varsemi, serliga innflutningsgjøldini. Við tað at tíðarskeiðið 1982/83 vignaðist heldur betur enn væntað, gjørdist eisini innflutningurin størri, og gav hetta eina eyka-inntøku í landskassan upp um tað, ið roknað varð við.

Útreiðslurnar vórðu settar á fíggjarlógina í tí prís- og lønarlag, landsstýrið metti fór at galda í fíggjarárinum.

Umframt tað, at roknast skuldi við avtalaðum lønarviðbótum v.m. skuldi leggjast fyri svarandi til 5 prístalsviðbøtur í mun til prístalið 1.7. 1981. Veruliga pristalsgongdin var henda:

| | | |
|---|---|---|
| 2 viðbøtur | pr. | 1.10.1981 |
| 0 - | - | 1. 1.1982 |
| 1 viðbót | - | 1. 4.1982 |
| 1 - | - | 1. 7.1982 |
| 2 viðbøtur | - | 1.10.1982 |
| 1 viðbót | - | 1. 1.1983 |
| 7 viðbøtur | til samans | |

Av hesum 7 viðbótum hava kortini bert 3 virkað alt fíggjarárið 1982/83, ein hevur virkað 3/4 av fíggjarárinum (frá 1.7.1982) tvær hava virkað hálvt fíggjarárið (frá 1.10.1982), og ein bert 1/4 av fíggjarárinum (frá 1.1.1983).

Lønarvøksturin frá prisviðbótum hevur sostatt júst svarað til 5 prísviðbøtur, sum lagt varð upp fyri.

Fyri aðrar útreiðslur enn lønir varð mett út frá eini prishækking upp á 12 1/2% í mun til 1.7.1981.

Veruliga prisgongdin var henda, málð við prístalinum (jan. 1980 = 100):

| | | **Vøkstur í mun til 1.7.1981** |
|---|---|---|
| Prístal 1. 7.1981 | 125,4 | |
| - 1. 4.1982 | 134,6 | 7,3% |
| - 1. 7.1982 | 138,3 | 10,3% |
| - 1.10.1982 | 142,8 | 13,9% |
| - 1. 1.1983 | 145,9 | 16,3% |

Í meðal fyri tíðarskeiðið 1.4.1982-31.3.1983 hevur prístalið ligið 12% omman fyri prístalið pr. 1.7.1981, stórt sæð svarandi til fíggjarlógarfyritreytirnar. Eitt annað mál er, at tað er óvist, hvussu væl prístalið lýsir prisgongdina á teimum vørum og tænastum, ið tað almenna keypir.

Tá ið fíggjarlógaruppskotið fyri 1882/83 varð framlagt, sá tað heldur ógvisligt út, heili 25% hægri enn á fíggjarlógini fyri 1981/82.

Ein partur av orsøkini til henda vøkstur var, at minni varð ætlað fíggjað við lántøku og meira við skatti og tolli, smb. broyting av tolllógini.

Ein onnur orsøk var sum nevnt tann nýggi hátturin at viðgera prísgongdina, soleiðis at ein partur av tí prís- og lønarvøkstri, sum áður kom til sjóndar á eykafíggjarlógini sást longu á fíggjarlógini.

Samanumtikið kann sigast, at tann broytta mannagongdin í sambandi við viðgerðina av fíggjarløgtingslógini hevur ført til, at betur samsvar er fingið millum fíggjarlógina og landskassaroknskapin.

**Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:**

*Ad § 6 - 6014 Strandfaraskip Landsins.*

Á hesi konto eru brúktar 9.821.000 kr. minni enn játta, og er høvuðsorsøkin leiguinntøkurnar frá Teistanum.

**Ad § 6 - 6028 Strandferðslan/Postverkið.**

Eykajáttan er lingin í fíggjarárinum fyri útreiðslunum upp á 1.697.100 kr. á hesi konto, sum atavar frá óseinju — sum hevur staðið við síðan 1977 — millum Postverk Føroya og Strandferðsluna um gjøld fyri sjóflutning.

*Ad § 6 - 6033 Bussruta Tórshavn-Kirkjubø o.a.*

Meirnýtslan hjá bussrutunum var tilsamans upp á 492.500 kr. í 1982/83.

Av hesum eru 250.000 kr. játtaðar í fíggjarárinum til fyribilsskipaða rutukoyring í Suðuroy. Játtanin til Bygdaleiðir — p/f Bil, Tórshavn — var í 1982/83 upp á 600.500 kr. Nýttar vóru 320.600 kr. meir enn játtað, meginparturin stavar frá, at inntøkurnar vóru 268.100 kr. minni enn roknað var við.

*Ad § 11 - 11257 Líkningarráð Føroya.*

Av meirnýtsluni 396.100 kr. vórðu 300.000 kr. játtaðar Líkningarráðnum eyka til forarbeiðið viðvíkjandi kelduskattinum.

*Ad § 11 - 11452 Gjaldstovan.*

Meirnýtslan í 1982/83 var uppá 3.126.800 kr. ella 26% stavar fyri tað mesta frá

| | | |
|---|---|---|
| konto 103143 | Løn/starvsfólk | 279.800 kr. |
| konto 103405 | Úrtíðarlønir | 230.200 kr. |
| konto 213105 | El, hiti og vask | 119.900 kr. |
| konto 233155 | Prentlutir | 206.500 kr. |
| konto 233259 | Postgjald | 377.000 kr. |
| konto 233553 | Edv.-útreiðslur | 1.731,300 kr. |
| konto 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 81.400 kr. |

Meir enn helvtin av meirnýtslu gjaldstovunnar stavar frá konto 233553 EDV-útreiðslur. Umleggingin til on-line (edv) hevur verið trupul. Kalkulatiónir, tíðarætlanir, arbeiðsskrá og yvirhøvur allar metingar hava ikki hildið. Hetta er høvuðsorsøkin til ta ovurstóru meirnýtsluna á edv-útreiðslukontoini.

Eisni hevur tann trupla og drúgva umleggingin til on-line verið høvuðsorsøkin til meirnýtsluna á konto 103405: úrtíðarlønir. Her er tað høvuðsbókhaldið og skattadeildin, ið hava brúkt meir enn ætlað.

Í fíggjarárinum er postgjaldið hækkað, og er hetta høvuðsorsøkin til meirnýtsluna á konto 233259: postgjald. Gjaldstovan sendir hvønn mánað stórt tal av postávísingum.

*Ad 11-11661 Heilsu-og heimasjúkrasystraumsitingin.*

Í fíggjarárinum kom kgl. fyriskipan um heilsu- og heimasjúkrasystraskipan í gildi. Landskassin ber útreiðslurnar av umsitingini av heilsu- og heimasjúkrasystraskipanini.

*Ad § 11-11758 Ferða- og dagpeningur innan- og uttanlands.*

Játtaðar vóru 1.750.000 kr. til ferða- og dagpening innan- og uttanlands í fíggjarárinum 1982/83. Brúktar vóru 2.380.777,21 kr. Meirnýtslan var sostatt 630.700 kr. ella 36%.

*Ad § 12-12601 Ljósmøður.*

Meirnýtslan er upp á 87.500 kr. Í samband við, at nýggj skipan viðvíkjandi jarðamøðrum kom í gildi 1. januar 1983, vórðu játtaðar 122.000 kr. eyka á hesa konto í fíggjarárinum.

*Ad § 12 - 12653 Heimasjúkrasystraskipan.*

Meirnýtslan upp á 381.300 kr. stavar sum fyrr nevnt undir rakstarstað 11661 frá, at kgl. fyriskipan um heimasjúkrasystrar kom í gildi í fíggjarárinum. Á hesi konto verða bókaðar útreiðslur, ið ikki koma undir umsiting.

*Ad § 12 - 12653 Skúlalæknar.*

Meirnýtslan upp á 34.600 kr. stavar frá, at kgl. fyriskipan um skúlalæknar kom í gildi í Føroyum í fíggjarárinum.

*Ad § 13 - 13089 Byggi- og rakstrargrunnur Postverksins.*

Postverk Føroya hevði eitt undirskot í 1982/83 upp á 900.000 kr.

*Ad § 14 - HF-skeið í Klaksvík og Gøtu.*

Í fíggjarárinum 1982/83 var stovnaður nýggjur studentaskúli í Gøtu. Hetta førdi við sær, at rakstrarstað 14169 varð býtt í tvey, so at Studentaskúlin í Eysturoy fekk rakstrarstað 14174.

Upprunaliga játtanin á fíggjarlógini rakstararstað 14169 var 3.893.000 kr. Brúktar eru:

| | | |
|---|---|---|
| rakstrarstað | 14169 | 2.708.209,81 kr. |
| - | 14174 | 3.458.708,37 - |
| | | 6.166.918,18 kr. |
| játtan á fíggjarl. 82/83 | | -3.893.000,00 - |
| | | 2.273.918,18 kr. |

Av hesum er eykajáttan fingin fyri 2.263.346,38 kr. í fíggjarárinum.

*Ad § 15 - 15722 Jarðfrøðiligar boringar.*

Tær 109.500 kr., ið brúktar eru í 1982/83, er restin av teim útreiðslunum, ið hava staðist av jarðfrøðiligu boringunum í Suðuroy.

*Ad § 15 - 15857 Náttúrufriðingarnevndir.*

Meirnýtslan upp á 150.400 kr. ella 187% stavar meginpartin frá konto 103309 samsýningar. Meirnýtslan á hesi konto var 137.311,00 kr.

*Ad § 15 - 15907 Ymiskir studningar.*

Á rakstrarstað 15907 eru brúktar 3.486.100 kr. meir enn játtað á fíggjarlógini 1982/83.

Hetta stavar frá, at goldnar eru 3.500.000 kr. meira til Norðurlandahúsið. Eykajáttan er fingin fyri hesi upphædd í fíggjarárinum.

*Ad § 16 - 16904/333017 Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna.*
Meirnýtslan á hesi konto var 24.402.800 kr. Hetta er alt lógbundnar útreiðslur.
Metingarnar um hvat skuldi setast á fíggjarlógina 1982/83 til endamálið eru gjørdar út frá fiskiskapinum árið frammanundan, men vísti tað seg ikki at vera nóg mikið.

Landsstyrið hevur í fíggjarárinum gjørt fíggjarnevndina varuga við støðuna. Málið er síðani viðgjørt í fíggjarnevndini.

*Ad § 16 - 16904/333104 Trygdargrunnur veiðimanna.*
Meirnýtslan var 154.700 kr. ella 77%. Hetta eru lógbundnar útreiðslur.

*Ad § 18 - 18304 Skipaskrá og uppmáting.*
Meirnýtslan upp á 61.074 kr. stavar fyri størsta partin frá konto 253903 aðrar útreiðslur. Útreiðslurnar stava frá nýggjari serligari fotokopieringsmaskinu til útskriftir av Føroya Skipaskráseting.

*Ad § 18 - 18323 Kolagrevstur.*
Meirnýtslan upp á 128.600 kr. stavar frá øktum kolagrevstri.

*Ad § 19 - 19403 Vanlig forsorg.*
Meirnýtslan var upp á 269.400 kr. ella 11%. Hetta eru lógbundnar útreiðslur.

*Ad § 19 - 19455 Víðkað hjálp.*
Meirnýtslan var upp á 726.400 kr. ella 65%. Hetta eru lógbundnar útreiðslur.

*Ad § 19-19557 Barnaforsorg.*
Meirnýtslan var upp á 587.600 kr. ella 18%. Hetta eru lógbundnar útreiðslur.

*Ad § 25 - 25401 Avskrivingar.*
Listin yvir avskrivingar er til skjals á landsskrivstovuni.

1. viðgerð 23. november. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 1. februar 1984 legði fram soljóðandi

## Álit
## í
## løgtingsmáli nr. 23/1983: Eykafíggjarløgtingslóg 1982/83.

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 17. november 1983 og undir 1. viðgerð tann 23. november beint í fíggjarnevndina.

Eftir uppskoti landsstýrisins eru samanløgdu inntøkurnar settar til *kr. 961.477.300,00*, meðan samanløgdu útreiðslurnar eru settar til *kr. 913.176.700,00*, soleiðis at inntøkumunur verður upp á samanlagt *kr. 48.300.600,00*.

Á inntøkusíðuni er hækkingin í mun til fíggjarlógina 1982/83 9,6% og á útreiðslusíðuni 3,9%.

Í inntøkunum er hækkingin sum árini áður, men hækkingin í útreiðslum er munandi minni.

Broytingin er orsakað av, at landsstýrið við fíggjarlógini fyri 1982/83 skifti mannagongd og legði seg eftir at fáa eina meiri realistiska fíggjarlóg enn áður.

Landsstýrið hevur í viðmerkingum sínum til lógaruppskotið greitt nærri frá, hvat serliga hevur verið lagdur dentur á til tess at røkka ætlaða málið.

Sum tað framgongur av tølunum, er tað eydnast landsstýrinum at fáa betur samsvar millum fíggjarlógina og landskassaroknskapin.

Rakstraryvirskotið 1982/83 verður at býta við 1/3 til grunnin til endurnýgging av skipaflotanum, 1/3 til berghols- og brúgvagerð og 1/3 til kapitalkonto; sostatt er farin fram ein munandi konsolidering; eitt úrslit, sum skyldast, at tær ætlanir, ið landsstýrið hevði í fíggjarárinum 1982/83 viðvíkjandi fíggjarlógini, eru loknar í eitt mát, sum kann sigast at vera gott í mun til árini frammanundan ein góður bati.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen, Asbjørn Joensen og Adolf V. Hansen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Atli P. Dam) vísir á, at verunliga meirinntøkan á eykafíggjarlógini í mun til sjálva fíggjarlógina 1982/83 er 100 mió. kr. og meirútreiðslurnar umleið 60 mió. kr. umframt part av teim 22 mió. kr. á § 23, sum landsstýrið álíknar ymsum grunnum at bera ístaðin fyri at standa við skyldur sínar.

Saman við lántøkuni upp á 52 mió. kr. smb. § 41 á fíggjarlógini

hevur sitandi samgonga longu eftir tveimum árum megnað at hækka fíggjarlógina við meira enn 300 mió. kr,. soleiðis at hon í 1982/83 er farin væl upp um milliardina.

Tá sitandi samgonga tók við, segði hon føroyskan búskap hava slíka slagsíðu, at skútan var um at søkka, tí skuldi siglast við repaðum seglum og rekast ein spari- og konsolideringspolitikkur.

Stóra andsøgnin í millum orð og gerðir, sum hevur eyðkent sitandi stýri, sýndi seg eisini á hesum øki, har í staðin fyri sparing gjørdist 45% økt nýtsla eftir tveimum árum, og har konsolideringin gjørdist ein øking av slagsíðuni við milliardvøkstri av skuldbinding føroyinga uttanlands.

Síðan 1980 er skattatrýstið økt við umleið 5%'um og tollhækkingarnar hava verið risastórar, ja bert broytingarnar í tolllógini í 1981 geva væl í dag einar 70 mió. kr. eyka um árið, og tað til endamál, ið er heilt annað enn tað av samgonguni upplýsta í 1981.

Tollhækkingarnar skulu sum kunnugt bera upp fyri eitt samanlagt hall upp á 40 mió. kr. fyri fíggjarlógirnar 79/80 og 80/81. Hetta hall er sostatt fleiri ferðir afturgoldið. Av hesum halli mugu tær milliónirnar ábygjast sitandi samgongu, sum loyvdi landsverksfrøðingsstovninum at yvirtrekkja fíggjarætlan sína við 20 mió. kr, í mars 1981, alt meðan samgongan klandraðist um sparing á Kallsoynni og í Skopun, tí 1. februar sama ár hevði hesin stovnur 12 mió. kr. eftir á fíggjarætlan síni.

Fyriliggjandi eykafíggjarlóg sýnir, at samgongan als ikki hevur rokkið at fáa tamarhald á nýtsluni, sum sýnir vøkstur á nærum øllum konti, dømi eru risavøkstirnir av kostnaðinum av uttanlandsferðing, sum skuldi avloysast av frímerkjum — og umboðan, sum skuldi minkast við avtøku av árligu løgmansveitsluni.

Tann flyting av byrðuni frá teim við betri gjaldsføri yvir á vanliga løntakaran, sum byrjaði í 1981 er hildin fram í 1982/83, soleiðis sum tað greitt framgongur av fyriliggjandi eykafíggjarlóg.

Sama umfordeiling av samfelagsvirðum sum hendan flyting er tekin um, vita vit, heldur fram, og nú er sum kunnugt samtykt skattaskipan, sum lítið broytir hetta. Ið hvussu er hækkar skattatrýstið 2-3% í mun til 1980 eisini í nýggju skipanini. Sama við økta tolltrýstinum og inflatiónini merkir hetta eina minking í realinntøku løntakaranna upp á 25-30%.

Viðurkenningin frá samgongumonnum av, at allur búskapar- og fíggjarpolitikkur hjá sitandi samgongu liggur í skeljum á gólvinum, sýnir nú eisini, at hetta eykagjald hava løntakararnir goldið til fá-

nýtis, tí útlitið er framvegis einki fyri, at hesir somu menn fáa tamarhald á fíggjarviðurskiftini.

Tá samstundis stendur greitt, at nú er samgongan farin at nýta av »reservunum« við at tøma teir stóru grunnarnar og at álíkna ynisum stovnum cina vaksandi lánbyrðu, so sigur hetta okkum, at betri var, um sitandi samgonga tók avleiðingarnar av hesum og legði frá sær.

Men sjálvt slíkt stig hevði ikki bøtt aftur ta risanýtslu, fyriliggjandi lóg er prógv um. Peningurin er nýttur, og samtyktin av hesi lóg er ein »formalitetur«, og ætlar javnaðarflokkurin ikki at lata vera við at ásanna hetta yvirforbrúk, men vil atkvøða fyri fyriliggjandi »roknskapi« fyri 1982/83.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) viðmerkir:

Tá ið sitandi samgonga tók við, kunngjørdi hon, at cykafíggjarlóg skuldi avtakast og ikki koma aftur, so leingi teir sótu í stjórn. Tí nú skuldu fíggjarviðurskifti landsins stýrast við skili. Allar játtanir á fíggjarlógini skuldu haldast upp á oyra og yvirtrekk hervið verða søga. Men hesin málsetningur — eins og teir flestu hjá teim borgarligu — vóru bert tóm orð uttan nakað hald í. Tí ongantíð í Føroya søgu hava yvirtrekkini á fíggjarlógini, og tað hjá øllum stovnum, verið so stór áður. So tosið uni almenna sparing hevur sett met í yvirforbrúki.

Føroya met — ár um ár — í nýtslu, og einans lítlum og ongum íløgum í vinnulívið. So ei undur í at uttanlandsskuldin nú eftir 3 árum er fleirfaldað, og at samgongumenn mugu ásanna, at alt sum eitur fíggjarpolitikkur er dottin á gólvið og liggur í skeljum.

Til og við eru flestu grunnar landsins tømdir. Ja, um tað so er tiltaksgrunnurin hjá ráfiskagrunninum, so er hann eisini oystur tómur.

Við hesi eykafíggjarlóg verður samlaða yvirskotið á fíggjarlógini 84 mió. kr. fyri árið 1982/83.

Nakað av øllum hesum millióna yvirskoti hevði komið væl við sum skattalætti hjá pensjónistum og landsins lægst løntu, men so skal ikki vera. Toll- og skattabyrðarnar hjá tí vanliga fólkinum skulu alsamt økjast.

Í frágreiðingini verður m.a. sagt frá, at almennar ferðaútreiðslur innan- og uttanlands eru øktar við 36%, so her er eingin spariknívur í nýtslu. Minstalønin er økt við 24 mió. kr., meðan tosað verður um met ár rokár — á Føroya leiðini.

Bussruturnar eru vorðnar 1/2 mió. dýrari at reka, og kann væl væntast, at hetta hall verður munandi størri framyvir, ja so leingi sum so lítið skil er í sjálvari koyringini — túratalinum — sum higartil.

Postverkið stendur fyri einum halli upp á 9.000.000 kr., m.a. av tí at Postverkið skuldi gjalda 1,7 mió. kr. í endurgjaldskravi til Strandfaraskip Landsins sum eykagjald fyri at føra postin yvir Vestmannasund við »Sam«. Tí fasthildið verður, at skal postbilínum tryggjast pláss við ferguni, so má postverkið gjalda munandi meiri, enn fyri vanligar bilar og lastbilar.

Eisini hevur landsstýrið noktað postverkinum at hækka postgjøldini hesi 3 árini á hædd við galdandi postgjøld í norðanlondum.

3,5 mió. kr. eru farnar eyka til Norðurlanda húsið. Ein fekk ta fatan, at hetta frálíka tiltak var ókeypis — ein gáva frá hinum norðanlondum, men nú skilst, at hendan gávan higartil hevur kostað okkum nærum 30-40 mió. kr. tilsamans.

Gjaldstovan teknar seg fyri eini meirnýtslu upp á heilar 3,2 mió., kr., eina mest til eina nýggja edv-skipan, sum als ikki riggar, og sum hevur gjørt roknskapin um inngjøld og skattakrøv til eina fløkju, ja kaos, har skattaborgarar ferð eftir ferð verða kravdir, ja so galið, verða pantaðir fyri skatt, sum langt síðani er goldin. Sum skilið er, so hevði tað verið nógvar ferðir betri, um hesar 3,2 mió. kr. vóru brútar til blýant og pappír ella talvur og griflar enn til eitt ikki virkandi og forstýrandi edv-system.

Strandfaraskip landsins hevur brúkt 9,8 mió. kr. minni enn játtað var, og er høvuðsorsøkin inngoldin leiga av »Teistanum« frá Trinidad.

Hesa eykainntøku kundu vit havt enn, ja ár framyvir, um landsstýrið hevði viljað forlongt leigusáttmálan, so sum teir í Trinidad ynsktu. Men aftur her ráddi ráðaloysi og illvilji landsstýrisins við løgmanni á odda, og skal skattgjaldarin nú gjalda eyka hesa einu mió. kr. um mánaðin, sum leigan gav og enn kundi givið landinum í inntøku.

Og hvar er so hendan milliardin farin? --- Hvat hava teir havt ráð til? Jú, eina royndarstøð í Kollafirði til 50-60 mió. kr., sum teir meta skal fáa landbúnaðin upp á føtur aftur, men her man mangur ivast í, um hetta tiltak fer at gera so stór undirverkir. Jú handils- og bankaskúlar eru bygdir, meðan vinnuskúlar ongan áhuga hava havt.

Jú, millión eftir millión eru latnar til at umbyggja gomul ótíðarhóskandi skip til trolarar at trola á landleiðini, eins og stuðul til nýggjar trolarar til Føroya leiðina, og hava harvið økt trýstið á botnstovnarnar so mikið, at allir botnstovnar eru ovurfiskaðir og í vanda fyri at týnast. Komandi ár koma væl einir 10 trolarar aftrat, so umframt at samgongu fiski- og fíggjarpolitikkur hevur ført okkum út í

óføri fíggjarliga, so eru teir í ferð við at oyða okkara lívsgrundarlag. Nú verða trolararnir so tættir á Munkagrunninum, at neyðugt verður at nýta fendaran, meðan tóað verður.

Til bergholsgerðina verða latnar 5 mió. kr. um árið, so við hesi ovurhonds upphædd verða tá berghol gjørd í hesi øld.

Fámjiningar søktu um hjálp til verju av lending og møl, eins og sumbingar søktu um verjugarð — katastrofuverju — av bakkanum, so ikki helvtin av bygdini skolar til sjós í næstu ódn. Hetta var ikki ráð til, bert ein lítil partur, meðan teir gleðiliga lótu eina heila millión kr. til »kunstverkið«, sum Havnar býráð hevur gjørt lystbátahavnina á Vestaru Vág.

Allir flokkar vóru samdir um at keypa ein helikoptara, ja meiriluti var fyri at keypa tveir nýggjar, men her fasthelt partur av samgonguni, at ein 8 ára gamal skuldi keypast, ella fingu vit ongan. Hann skuldi bert kosta 7 mió., men longu nú stendur hann okkum í 10 mió. kr., ella somu upphædd, sum vit kundu fingið tveir nútíðar helikoptarar fyri.

Annars má sigast, at enn eru nógv dulsmál — fíggjarlig dulsmál. T.d. er ikki komið fram enn, hvat leigan av »Tyrlu« kostaði landinum. Ei heldur, hvat umleggingin til samtíðarskatt kostar, hvar tól verða keypt og leigusáttmálar verða gjørdir í loyndum.

Nú eru heili tvey hús keypt til alment sjónvarp, og eisini her er eitt ókent huldumál. Løgmaður segði, at hann fyri landsins rokning hevði keypt 12 Båder-flakamaskinur til svartkjaftaframleiðslu. Hvat hesar ónýtiligu maskinur hava kostað, veit eingin, og hvør ið hevur fingið tær er eisini eitt dulsmál o.s.fr.

Framhaldandi 2. viðgerð 9. mars. Málið varð aftur beint í fíggjarnevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

## Álit II

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 17. november 1983 og undir 1. viðgerð tann 23. november beint í fíggjarnevndina.

Álitið frá fíggjarnevndini varð lagt fram tann 27. januar 1984.

Undir 2. viðgerð tann 8. februar 1984 upplýsti Tórbjørn Poulsen, fíggjarmálaráðharri, at sambært rakstrarroknskapinum 1982/83 er rakstraryvirskotið fyri skeiðið kr. 69.497.910,51.

Fíggjarnevndarlimurin Adolf V. Hansen vísti á at sambært tøl-

unum í uppskotinum til eykafíggjarløgtingslóg er rakstraryvirskotið kr. 48.300.600,00. Hann bað tí um, at málið fór aftur í fíggjarnevndina.

Løgtingið samtykti at málið skuldi beinast aftur í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið aftur á fundi tann 23. februar 1984 og býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirlutin (Ivan Johannesen, Olaf Olsen, Øssur Dam Jacobsen, Asbjørn Joensen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins vísandi til álitið frá 27. januar 1984 og verður hjálagdur landskassans roknskapur 1982/83 og fíggjarstøða pr. 31. mars 1983 sum skjal í málinum.

Minnilutin (Atli P. Dam) vísir til álit sítt frá 27. januar 1984.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) vísir til viðmerkingar sínar í álitinum frá 27. januar 1984.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) er av teirri áskoðan, at ein eykafíggjarløgtingslóg er ein lógfesting av inntøku/útreiðslumuninum millum mettu fíggjarlógarhæddina og verunligu (endaligu) roknskapartølini. Minnilutin heldur tað tí vera spæl og ikki annað, tá løgtingið lógfestir talmunin millum eina »metta« fíggjarlóg og eina eykafíggjarlóg.

Landskassaroknskapartølini vísa, at avlopið á eykafíggjarlógini er um 23 mió. kr. meira enn upprunaliga mett.

Sambært landskassarokuskapin er, rættari átti at verið, samlaða avlopið á eykafíggjarlógini kr. 69 mió.

Sambært løgtingslóg skal tílikt avlop lutast í tríggjar partar soleiðis at

1/3 fer í landskassalikvidetin,
1/3 fer í grunnin til endurnýgging av fiskiskipaflotanum,
1/3 fer í grunnin til berghols- og brúgvagerð.

Her er sostatt talan um eina eykainntøku til grunnin til berghols- og brúgvagerð uppá umleið 23 mió. kr.

Minnilutin metir Sumbiar bergholið at vera tað mest átrokandi samferðslumál at loysa í løtuni.

Minnilutin setir fram soljóðandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at helvtin (11,5 mió. kr.) av tí 1/3 av avlopinum av eykafíggjarlógini 1982/83, sum skal í grunn til berghols- og brúgv-

agerð, verður brúktur til Sumbiar bergholið, solciðis at tað arbeiðið kann fara í gongd í summar.

9. mars varð málið aftur beint í fíggjarnevndina, sum 6. apríl legði fram soljóðandi

**Alit**
**III**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 17. november 1983 og undir 1. viðgerð tann 23. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Álitið frá fíggjarnevndini varð lagt fram tann 27. januar 1984. Undir 2. viðgerð tann 8. februar varð málið beint aftur í fíggjarnevndina.

Nýtt álit varð avgreitt, dagf. 24. februar 1984 og lagt fram í tinginum tann 9. mars 1984. Málið varð sama dag beint aftur í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur aftur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og 3 minnilutar.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins og vísir til álitini frá 27. januar og 24. februar 1984.

Minnilutin (Atli P. Dam) vísir til álit sítt frá 27. januar og 24. februar 1984.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) vísir til viðmerkingar sínar frá 27. januar og til álitið frá 24. februar 1984.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) vísir til viðmerkingar sínar í álitinum frá 24. februar 1984 og tilskilar, at talið 11,5 mió. kr. eigur at verða broytt til 7,5 mió. kr., orsakað av at tað er vorðið upplýst, at landsstýrið hevur disponerað yvir 15 mió. kr. av teimum tøku 23 mió. kr.

Framhaldandi 2. viðgerð 27. apríl. Atkvøðugreiðslan 4. mai. Uppskotið til samtyktar í áliti 11 fall við 14-0. Atkvøtt var við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Vilhelm Johannesen, Tórálvur M. Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, J. Henriksen, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Ingrid Sondum, Hans J. Debes, Petur Reinert, Hans Marius Joensen.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Finnbogi Isaksen, Arne Ziskasen, Poul Mikkelsen, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Edmund í Garði, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein.

§ 1 samtykt við 24-0 atkvøðum, § 2 við 23-0, §§ 3-8 samtyktar við 24-0, §§ 10-26 samtyktar við 25-0. At fara til 3. viðgerð samtykt við 25-0 atkvøðum.

3. viðgerð 8. mai. Málið samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 400-35. Lóg nr.

---

# 24. Tvingaðar krabbameinskanningar.

Ár 1983, mikudagin 23. november legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum beinanvegin at leggja fyri tingið lógaruppskot um tvingaða árliga krabbameinskanning av øllum landsins borgarum.

Somuleiðis verður álagt landsstýrinum at avseta eina rímiliga upphædd á komandi fíggjarlóg.

**Viðmerkingar;**
Í Føroyum fyrikemur árliga eitt stórt tal av krabbameinstilburðum. Í nøkrum førum eydnast læknunum at basa sjúkuni, men í alt ov mongum førum viðføra tilburðirnir deyðan fyri viðkomandi. Hetta ger seg serliga galdandi í teimum førum, har krabbameinið hevur rakt yngri fólk og fólk í besta aldri.

Av trygdarorsøkum hava vit regluligar kanningar av skipum (skipasýnið) og av akførum (bileftirlitið), og alt gott um tað. Her er tó talan um materiellar kanningar, meðan ongar stórvegis kanningar eru av teimum fólkum, sum eru við hesum førum. Tó skal ikki verða gloymd tuberklakanningin, sum hevur gjørt sonn heilsulig undurverk millum føroyingar.

Ongin ivi er um, at ein tvingað árlig krabbameinskanning fær eins stóran týdning fyri Føroya fólk.

Tá hugsað verður um, at nógvir av krabbameinstilburðunum, sum hava deyðan sum enda, eru hjá ungum fólki og fólki í bestu árum, so er vituligt, at tilburðirnir ikki eru nakað minni enn sorgarleikir fyri tey avvarðandi, tey veri seg børn, hjúnafelagar, foreldur og systkin ella onnur.

Í einum brævi til uppskotsstillaran skrivar ein av Framburðsfloksins stuðlum nakað soleiðis um hesi viðurskifti:

»Eitt dømi var fyri kortum, tá eitt ungfólk fekk brøv frá tí almenna (Bileftirlitinum) um, at bilurin hjá viðkomandi skuldi kannast. Ikki tí, hetta er eitt gott tiltak, men tað, sum var so harmiligt, var, at nakað seinni, tá henda sama unga menniskja fór til læknan, tí hon føldi seg so illa og altíð var móð, fekk henda unga menniskja tey skelkandi og lagnutungu boð, at hon var uppetin av krabbameini og var ikki til at bjarga, men var hon komin fyrr, so hevði sæð betur út. Um tilsvarandi reglur fyri tvingaðari kanning høvdu verið galdandi fyri akfarseigarunum fyri akfarið, so hevði viðkomandi møguliga verðið bjargaður«.

Og ein sorgarleikur hevði verið minni, kann leggjast aftrat.

1. viðgerð 5. december. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 16. mars 1984 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er lagt fram á ting av Adolf V. Hansen og varð við 1. viðgerð hin 5. december 1983 beint í sosialu nevndina.

Tað verður arbeitt nógv í løtuni við spurninginum um krabbameinssjúkur og viðvíkjandi heilsustøðuni sum heild. Hetta verður gjørt bæði av heilsumyndugleikunum, frá læknasíðu og av áhugafeløgum. Nevndin metir ikki, at løgtingið eigur at leggja seg út í henda spurning.

Nevndin er tí samd um einki uppskot at seta fram.

2. viðgerð 21. mars. Uppskotið fall við 2-0 atkvøðum.

---

# 25. Broyting í lóg um seming.

Ár 1983, mánadagin 5. decembher legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um broytingar í lóg um seming.**

§ 1. Í lóg nr. 86 frá 31. mars 1928 »om mægling i arbejdsstridigheder«, sum broytt við løg-

**lagtingslov om ændringer i lov om mægling i arbejdsstridigheder.**

§ 1. I lov nr. 86 af 31. marts 1928 om mægling i arbejdsstridigheder, som ændret ved lag-

tingslóg nr. 79 frá 22. december 1951, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, stk. 2, verður orðað soleiðis:

»Áðrenn hvørt val reikar landsstýrið fyri setan av nevnd við 15 limum, sum verða valdir soleiðis:

2 av Føroya Fiskimannafelag,
2 av Føroya Arbeiðarafelag,
1 av Føroya Skiparafelag,
1 av Føroya Handverkarafelag,
1 av Maskinmeistarafelagnum
3 av Føroya Reiðarafelag,
3 av Føroya Arbeiðsgevarafelag,
1 av Føroya Handverksmeistarafelag. Harafturat verður ein limur útnevndur av sorinskrivaranum, og er hesin nevndarformaður.«

2) Í § 1 stk. 3, verður »7« broytt til: »8«.

3) Í § 1 verður í øllum førum orðið »amtmanden« broytt til: »landsstýrið«.

**§ 2.** Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

tingslov nr. 79 af 22. december 1951, foretages følgende ændringer:

1) § 1, stk. 2, affattes således:

»Forud for hvert valg foranlediger landsstyret nedsat et nævn med 15 medlemmer, der vælges således:

2 af Føroya Fiskimannafelag,
2 af Føroya Arbeiðarafelag,
1 af Føroya Skiparafelag,
1 af Føroya Handverkarafelag,
1 af Maskinmeistarafelagið,
3 af Føroya Reiðarafelag,
3 af Føroya Arbeiðsgevarafelag,
1 af Føroya Handverksmeistarafelag. Desforuden udpeges 1 medlem af sorenskriveren og er denne nævnets formand«.

2) I § 1, stk. 3, ændres »7« til: »8«.

3) I § 1 ændres i alle tilfælde ordene »amtmanden« til: »landsstyret«.

**§ 2.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Føroya Handverkarafelag hevur sett fram áheitan um at fáa lim í nevndina til val av semingsmanni.

Eftir § 1 í lóg nr. 86 frá 31. mars 1928 »om mægling i arbejdsstridigheder« er nevndin til val av semingsmanni samansett soleiðis:

| | |
|---|---|
| Føroya Fiskimannafelag velur | 2 limir, |
| Føroya Skiparafelag | 1 lim, |
| Føroya Arbeiðarafelag | 2 limir, |

| | |
|---|---|
| Føroya Reiðarafelag | 2 limir, |
| Føroya Keypmannafelag | 2 limir, |
| Føroya Arbeiðsgevarafelag | 1 lim. |

Haraftrat útnevnir sorinskrivarin ein lim, sum er formaður, og eru sostatt 11 limir tilsamans í nevndini.

Yrkisfeløgini hava einki ímóti, at Føroya Handverkarafelag og Maskinmeistarafelagið, sum eisini er tikið við, fá lim í nevndina, men vilja eingi feløg avgeva limir, so samlaða limatalið í nevndini kann verða tað sama.

Umframt Handverkarafelagið og Maskinmeistarafelagið fær Føroya Handverksmeistarafelag eisini ein lim í nevndina.

Eftir uppskotinum fær Føroya Keypmannafelag, sum nú velur 2 limir í nevndina, ikki nakran lim í nevndina, tá felagið ikki hevur sáttmála við feløg, sum semingsmaðurin eftir hesi lóg skal taka sær av. Felagið hevur sáttmála við S & K, men semingsmaður til at taka sær av hesum sáttmála skal veljast eftir § 9 í løgtingslóg um starvsmenn nr. 13 frá 20. mars 1958.

Fyri at javnvág skal vera í nevndini, verður talið av limum, sum Føroya Reiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag skulu velja, økt frá 2 til 3 limir hvør.

1. viðgerð 5. december. Málið varð beint í lógarnevndina, sum 9. mars legði fram soljóðandi

**Álit**
**í**

**løgtingsmáli nr. 25/1983: Broyting í lóg um seming.**

Málið varð framlagt av landsstýrinum 5. december 1983 og við 1. viðgerð 9. í sama mánaði beint í lóganevndina.

Eftir uppskotinum verður nevndin til val av semingsmanni broytt soleiðis, at eisini Føroya Handverkarafelag, Føroya Handverksmeistarafelag, og Føroya Maskinmeistarafelag koma at taka lut í valinum, meðan Føroya Keypmannafelag, ið ikki hevur lønarsáttmála á hesum øki, ikki longur verður við til val av semingsmanni.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

2. viðgerð 16. mars. § 1 samtykt við 28-0 atkvøðum, § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 20 mars. Uppskot landsstýrisins endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1306-2-4. Lóg nr. 40 frá 10. mai 1984.

---

# 26. Lóg um rættargjøld.

Ár 1983, týsdagin 6. december legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður fyri Páll Vang, landsstýrismann, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið mælir ríkisstýrinum til at leggja fyri fólkatingið hjálagda uppskot (skjal 1) til lóg fyri Føroyar um rættargjøld.

**Viðmerkingar;**

Rættargjøld í Føroyum, eisini í hesum málum til landsrætt og hægstarætt verða roknað eftir reglum frá 1800 talinum (t.d. Sportelregelment fra 1814, 1836, 1868 og 1874). Hesar reglur eru als ikki tíðarhóskandi og tvørligar at umsita. Bæði sorinskrivarin og eystari landsrættur hava ynskt reglurnar tiknar upp til viðgerðar (nýskipan).

Eftir uppskotinum verður mælt til at nýta eisini í Føroyum donsku lógina um rættargjald við ymsum broytingum orsakað av serligu føroysku viðurskiftunum.

Sorinskrivarin hevur gingið í gjøgnum øll borgarlig sakarmál fyri árið 1981. Sambært saklistan snýr ta seg um tilsamans 2371 mál, men harav eru bert 2329 verulig sakarmál, meðan restin hevur verið útmelding av metingarmonnum, ómynduggeran o.t. Av hesum 2329 sakarmálum verða bert millum 200 og 300 dómsviðgjørd, meðan restin verður hevað ella verður tikin upp til fráverudóm.

Eftir støddini av sakarkravinum kunnu málini býtast soleiðis upp:

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Undir | 500 kr. | 273 | mál | ella | 12,0% |
| | 500-1.000 - | 292 | - | - | 12,1% |
| | 1.000-3.000 - | 591 | - | - | 25,3% |
| | 3.000-10.000 - | 617 | - | - | 26,5% |
| | 10.000-50.000 - | 382 | - | - | 16,8% |
| | 50.000-100.000 - | 57 | - | - | 2,4% |
| | 100.000-1.000.000 - | 52 | - | - | 2,3% |
| Yvir 1 mill. kr. | | 2 | - | - | 0,1 |
| Mál viðv. øðrum enn peningi | | 58 | - | - | 2,5% |

Rættargjaldið fyri borgarlig mál fellur í 4 partar, harav 2 kr. fyri berammilsi, 3 kr. fyri inkamination, 3 kr. fyri upptøku til dóms og 1 kr. fyri dómsútskrift. Av røttum eigur hetta eisini at krevjast upp í 4 pørtum. Aftrat rættargjaldinum koma útreiðslurnar av kunngering av stevning, sum saksøkjarin má bera. Hetta kostar 11 kr., um kunngjørt verður gjøgnum stevningsmann og 9,80 kr., um kunngjørt verður gjøgnum postin.

Eftir galdandi reglum í Danmark, sum ætlanin nú er at seta í gildi eisini fyri Føroyar, er rættargjaldið 130 kr., har sakarkravið ikki fer upp um 3.000 kr. og 1% av tí partinum av sakarkravinum, sum er omanfyri 3.000 kr. Har sakarkravið snýr seg um annað enn pening, er rættargjaldið 150 kr. Tað er rætturin, sum tekur sær av kunngering av stevning og ber útreiðslurnar av kunngeringini.

Niðanfyri eru tikin nøkur dømi um rættargjald og sakførarakostnað:

| | Gildandi reglur | Uppskotið |
|---|---|---|
| 1. Sakarkrav 100 kr. | | |
| a. Fráverudómur ..... | 100 kr. | 100 kr. |
| Sakarkostnaður | 60 - | 60 - |
| Rættargjald | 9 - | 130 - |
| kunngering | 11 - | 0 - |
| | 180 kr. | 290 kr. |
| b. Málið verður dómsviðgjørt | 100 kr. | 100 kr. |
| Sakarkostnaður | 300 - | 300 - |
| Rættargjald | 9 - | 130 - |
| Kunngering | 11 - | 0 - |
| | 420 kr. | 530 kr. |
| 2. Sakarkrav 500 kr. | | |
| a. Fráverudómar ..... | 500 kr. | 500 kr. |
| Sakarkostnaður | 130 | 130 - |
| Rættargjald | 9 - | 130 - |
| Kunngering | 11 - | 0 - |
| | 650 kr. | 760 kr. |
| b. Málið verður dómsviðgjørt | 500 kr. | 500 kr. |
| Sakarkostnaður | 300 - | 300 - |
| Rættargjald | 9 - | 130 - |
| Kunngering | 11 - | 0 - |
| | 820 kr. | 930 kr. |
| 3. Sakarkrav 1000 kr. | | |
| a. Fráverudómur ..... | 1.000 kr. | 1.000 kr. |
| Sakarkostnaður | 230 - | 230 - |
| Rættargjald | 9 - | 130 - |
| Kunngering | 11 - | 0 - |
| | 1.230 kr. | 1.360 kr. |

| | | |
|---|---|---|
| b. Málið verður dómsviðgjørt | 1.000 kr. | 1.000 kr. |
| Sakarkostnaður | 500 - | 500 - |
| Rættargjald | 9 - | 130 - |
| Kunngering | 11 - | 0 - |
| | 1.520 kr. | 1.630 kr. |

4. Sakarkrav 3.000 kr.

| | | |
|---|---|---|
| a. Fráverudómur ..... | 3.000 kr. | 3.000 kr. |
| Sakarkostnaður | 480 - | 480 - |
| Rættargjald | 9 - | 130 - |
| Kunngering | 11 - | 0 - |
| | 3.500 kr. | 3.610 kr. |
| b. Málið verður dómsviðgjørt | 3.000 kr. | 3.000 kr. |
| Sakarkostnaður | 1.200 - | 1.200 - |
| Rættargjald | 9 - | 130 - |
| Kunngering | 11 - | 0 - |
| | 4.220 kr. | 4.330 kr. |

5. Sakarkrav 10.000 kr.

| | | |
|---|---|---|
| a. Fráverudómur ..... | 10.000 kr. | 10.000 kr. |
| Sakarkostnaður | 840 - | 840 - |
| Rættargjald | 9 - | 200 - |
| Kunngering | 11 - | 0 - |
| | 10.860 kr. | 11.040 kr. |
| b. Málið verður dómsviðgjørt | 10.000 kr. | 10.000 kr. |
| Sakarkostnaður | 2.540 - | 2.540 - |
| Rættargjald | 9 - | 200 - |
| Kunngering | 11 - | 0 - |
| | 12.560 kr. | 12.740 kr. |

| | | |
|---|---|---|
| 6. Sakarkrav 50.000 kr. | | |
| a. Fráverudómur ..... | 50.000 kr. | 50.000 kr. |
| Sakarkostnaður | 1.510 - | 1.1510 - |
| Rættargjald | 9 - | 600 - |
| Kunngering | 11 - | 0 - |
| | 51.530 kr. | 52.110 kr. |
| b. Málið verur dómsviðgjørt | 50.000 kr. | 50.000 kr. |
| Sakarkostnaður | 5.980 - | 5.980 - |
| Rættargjald | 9 - | 600 - |
| Kunngering | 11 - | 0 - |
| | 56.000 kr. | 56.580 kr. |
| 7. Sakarkrøv 100.000 kr. | | |
| a. Fráverudómur ..... | 100.000 kr. | 100.000 kr. |
| Sakarkostnaður | 2.260 - | 2.260 - |
| Rættargjald | 9 - | 1.100 - |
| Kunngering | 11 - | 0 - |
| | 102.280 kr. | 103.260 kr. |
| b. Málið verður dómsviðgjørt | 100.000 kr. | 100.000 kr. |
| Sakarkostnaður | 9.580 - | 9.580 - |
| Rættargjald | 9 - | 1.100 - |
| Kunngering | 11 - | 0 - |
| | 109.600 kr. | 110.680 kr. |
| 8. Sakarkrav 1 millión kr. | | |
| a. Fráverudómur ..... | 1.000.000 kr. | 1.000.000 kr. |
| Sakarkostnaður | 15.730 - | 15.730 - |
| Rættargjald | 9 - | 11.100 - |
| Kunngering | 11 - | 0 - |
| | 1.015.750 kr. | 1.025.830 kr. |

| | | |
|---|---|---|
| b. Málið verður dómsviðgjørt | 1.000.000 kr. | 1.000.000 kr. |
| Sakarkostnaður | 39.580 - | 39.580 - |
| Rættargjald | 9 - | 10.100 - |
| Kunngering | 11 - | 0 - |
| | 1.039.600 kr. | 1.049.680 kr. |

9. Sakarkravið annað enn peningur

Sakarkostnaðurin verður settur eftir ætli eftir hvussu stórt arbeiði er av sakini og eftir hvat sakin snýr seg um.
Rættargjaldið er eftir galdandi reglum 9 kr. + 11 kr. fyri kunngering og eftir uppskotinum 150 kr.

Tað er tann tapandi parturin, sum skal rinda kostnaðin til mótpartin. Um hann møtir við advokati, má hann harnæst gjalda kostnaðin til sín egna advokat. Um so er, at tað miseydnast at fáa stevningina kunngjørda rættstundis, má saksøkjarin kunngera av nýggjum og gjalda útreiðslurnar av teirri nýggju kunngeringini.

Inntøkan av rættargjaldinum í 1981 skuldi givið 9 x 2329 mál ella 20.961 kr. Um uppskotið hevði verið galdandi í 1981, hevði inntøkan verið 563.869 kr.

Føroya Advokatfelag, ið hevur havt umboð í tí arbeiðsbólki, sum hevur tilrátt uppskotið, mælir frá, at rættargjøldini verða hækkað munandi, men hevur ongar viðmerkingar til, at hesi gjøld verða broytt soleiðis, at útrokningin gerst einfaldari. Í skrivi dagfest 4. november 1982, sum fylgir hjálagt sum skjal 2, hevur advokatfelagið greitt nærri frá sínum sjónarmiðum.

Til sjónarmiðini hjá advokatfelagnum er at siga, at rættargjaldið er tann minsti parturin av útreiðslunum av einum sakarmáli, samanber yvirlitið framman fyri um rættargjald og advokatkostnað av ymsum sakarmálsupphæddum.

Uppskotið førir við sær munandi hækkingar í rættargjøldunum, men má havast í huga, at gjøldini eru ásett í 1836 og hækkingarnar í hesi hálvu aðru øld hava verið smáar. Uppskotið vil geva sorinskrivaranum ein stóran lætta við innkrevjingini og bókføringini av rættargjaldinum, sum tó framvegis verður ein lítil partur av útreiðslunum av at føra sak, og fólk við inntøku undir sjúkrakassamarkinum hava framvegis møguleika fyri at fáa fría process og harvið gjaldið afturgoldið.

Viðlagt fylgir serprent av lógarkunngerð nr. 217 frá 13. mai 1981 (skjal 3).

1. viðgerð 6. december. Málið varð beint í lóganevndina, sum 12. mars 1984 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð framlagt av landsstýrinum 6. december 1983 og við 1. viðgerð 9. í sama mánað beint í lóganevndina.

Eftir uppskotinum verða rættargjøldini, sum hava verið so at siga óbroytt í eina heila øld, førd ájour, umframt at reglurnar verða broyttar soleiðis, at uppkrevjingin av gjøldunum verður minni arbeiðskrevjandi.

Undir viðgerðini av málinum hava Jógvan Andreasen, sorinskrivari, og Kári Petersen, formaður í advokatfelagnum, verið á fundi í nevndini og greitt frá teirra sjónarmiði.

Sorinskrivaraembætið gevur við núverandi gjøldum eitt rakstrarundirskot upp á 2 mió. kr. árliga, sum um viðlagda uppskot verður samtykt, verður um 1/2 mió. kr. minni, men tá eru avskrivingar av bygningum, sum fyri stuttari tíð síðani eru nútíðargjordir, ikki tiknar við.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Asbjørn Joensen, Agnar Nielsen, Arne Ziskasen og Jákup Lindenskov) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

Minnilutin (Petur Reinert) heldur, at dómsvaldið eigur at vera yvirtikið og setir fram fylgjandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at hækka rættargjøldini, soleiðis at sorinskrivaraembætið kann hvíla í sær sjálvum, samstundis sum dómsvaldið verður yvirtikið sum sermál.

2. viðgerð 16. mars. Málið varð aftur beint í sosialu nevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi

**Álit II**

Lóganevndin legði fram álit í málinum tann 7. mars 1984 og við 2. viðgerð tann 12. s.m. varð málið beint aftur í nevndina við áheitan um at kanna sosialu fylgjurnar av lógaruppskotinum.

Nevndin hevur lagt spurningin fyri Almannastovuna og Sorinskrivaran, sum í viðløgdu skrivum dagfest ávikavist 29. mars 1984 og 9. apríl 1984 hava gjørt sínar viðmerkingar.

Nevndin dugir ikki at síggja at lógin hevur nakra sosiala slagsíðu.

Framhaldandi 2. viðgerð 27. apríl. Atkvøðugreiðsla 1. mai. Uppskot landsstýrisins samtykt við 17-0 atkvøðum.

Broytingaruppskot frá Peturi Reinert fall við 6-0.

F.L.j.nr. 516-1.

---

# 27. Veðhald fyri láni til Húsalánsgrunnin.

Ár 1983, týsdagin 6. december legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, fyri Páll Vang, landsstýrismann, vegna landsstýrið fram soljóðandi

## Uppskot til

**løgtingsóg um veðhald fyri láni til Húsalansgrunnin.**

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri innan- ella uttanlandsláni til Húsalánsgrunnin uppá 30 mió. kr. ella mótvirðið av hesi upphædd í fremmandum gjaldoyra.

§ 2. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

**lagtingslov om garanti for lån til Huselånefonden.**

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere indenlandsk eller udenlandslån til Huselånefonden på 30 mio. kr. eller modværdien af nævnte beløb i udenlandsk valuta.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Húsalánsgrunnurin hevur við skrivi dagfest 30. november 1983 sent landsstýrinum soljóðandi umsókn við hjáløgdum skjølum:

»(Sí skjøl)«.

Landsstýrið hevur á fundi tann 24. november 1983 samtykt at geva loyvi og verður lógaruppskot við hesum lagt fyri løgtingið.

Sí skjøl 5 A-F

1. viðgerð 9. december. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 15. december legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 6. december 1983 og undir 1. viðgerð tann 9. december beint í fíggjarnevndina.

Skotið verður upp at landsstýrið fær heimild at veðhalda fyri innanella uttanlandsláni 30 mió. kr. ella mótvirðið av nevndu upphædd í fremmandum gjaldoyra.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 13 december 1983 og mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 15. december. § 1 varð samtykt við 28-0 atkvøðum, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. At fara til 3. viðgerð samtykt við 28-0 atkvøðum.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1426-5-5. Lóg nr. 119 frá 29. december 1983.

---

# 28. Veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir.

Ár 1983, mánadagin 5. december legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir.**

**§ 1.** Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1984/85 og 1985/86 at veðhalda fyri lánum upp til 2,4 mió. kr. hvørt fíggjarárið til smærri ídnaðarvirkir.

**lagtingslov om garanti for lån til mindre industrivirksomheder.**

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansårene 1984/85 og 1985/86 at garantere for lån indtil 2,4 mio. kr. hvert finansår til mindre industrivirksomheder.

**§ 2.** Hesi lán verða at nýta til stovnan av nýggjum virkjum, vøkan og nútimansgerð av gomlum o.t.

*2. stk.* Lánini mugu ikki fara upp um 70% av tí virði, sum nýggju fløgurnar hava eftir meting.

*3. stk.* Lánini skulu verða tryggjað við panti í fastogn ella leysafæ innanfyri 70% av tí virði, fastognin ella leysafæið eru mett til. Leysafæ kann bert nýtast sum pant um metingarvirðið er ikki minni enn 100.000 kr.

**§ 3.** Kemur landskassin sum veðhavari at rinda pening, og sostatt fær krav móti skuldaranum, verður kravið at renta við rentu, landsstýrið ásetir, frá tí degi, landskassin hevur lagt pening út.

**§ 4.** Um lán ikki er veitt 1 ár eftir at landsstýrið hevur givið tilsøgn um veðhald, fellur tilsøgnin burtur.

**§ 5.** Henda lóg fær gildi beinanvegin.

**§ 2.** Disse lån skal anvendes til reetablering af virksomheder, udvidelse og modernisering af gamle o.l.

*Stk. 2.* Lånene må ikke overstige 70% af den værdi, som de nye investeringer har i henhold til vurdering.

*Stk. 3.* Lånene skal være sikrede ved pant i fast ejendom eller løsøre indenfor 70% af den værdi, som den faste ejendom eller løsøret er vurderet til. Løsøre kan dog kun anvendes som pant for så vidt vurderingssummen er ikke mindre end 100.000 kr.

**§ 3.** Såfremt landskassen som kautionist kommer til at betale penge, og på denne måde får krav imod skyldneren, forrentes dette krav med en rente, som landsstyret fastsætter, fra den dag, landskassen har udlagt beløbet.

**§ 4.** Såfremt lån ikke er effektueret et år efter at landsstyret har givet tilsagn om kaution, bortfalder tilsagnet.

**§ 5.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Landsstýrið hevur hvørt ella annaðhvørt ár síðani 1960 fingið heimild við løgtingslóg at veðhalda fyri lánum til smærri íðnaðarvirkir. 1. apríl 1984 gongur núverandi heimild út, sum er ásett við løgtingslóg nr. 29 frá 11. mars 1982, jbr. løgtingsmál nr. 80/1981, løgtingstíð-

indi 1981 bls. 382. Við heimild í løgtingslóg nr. 29 frá 11. mars 1982 um veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir hevur landsstýrið í fíggjarárinum 1982/83 veitt 800.000 kr. í veðhaldi, og í fíggjarárinum 1983/84 526.000 kr. í veðhaldi.

Uppskotið til nýggja løgtingslóg um veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir verður tí við hesum lagt fram. Í høvuðsheitunum svarar uppskotið til innihaldið í løgtingslóg nr. 29 frá 11. mars 1982 um veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir, sum var galdandi fyri fíggjarárið 1982/83 og 1983/84.

*Til § 1* er at viðmerkja, at upphæddin í mun til gomlu lógina er hækkað frá 2 mió. kr. til 2,4 mió. kr. hvørt fíggjarár. Hetta svarar til vanligan prístalsvøkstur.

*Til § 2, stk. 3* er at viðmerkja, at lógin nú tilskilar meiri greitt, tað sum praksis hevur verið higartil, nevniliga, at veðhald verður latið, bæði tá ið lánið er tryggjað við panti í fastogn ella leysafæ. Av praktiskum orsøkum verður ásett, at leysafæ, sum sett verður sum trygd, hevur eitt minstamet. Hetta kemst av, at leysafæið skal kunna geva trygd, ikki bert fyri lánum, men eisini kostnaði í samband við lánið og at leysafæið lættliga skal kunna skrásetast.

**Til § 3** er at viðmerkja:

Í § 3 verður spurningurin um rentuviðurskifti gjørdur greiður, soleiðis at eingin ivi er um, hvussu rættarstøðan er, tá landskassin sum veðhaldari kemur at leggja út.

**Til § 4** er at viðmerkja, at greinin er sett inn fyri at lættari skal verða fyrisitingarliga at halda skil á veðhaldsskyldunum.

Víst verður annars til viðmerkingarnar í løgtingslóg nr. 29 frá 11. mars 1982.

1. viðgerð 9. december. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 12. mars 1984 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið var lagt fram av landsstýrinum tann 5. december 1983 og undir 1. viðgerð tann 9. í sama mánaði beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og tekur eina samd nevnd undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 16. mars. § 1 samtykt við 27-0 atkvøðum, §§ 2-4 samtyktar við 27-0 atkvøðum, § 5 samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 20. mars. Uppskot landsstýrisins endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1427-2. Lóg nr. 32 frá 3. mai 1984.

---

# 29. Broyting í kommunulæknaskipanini (Sandoyar læknadømi).

Ár 1983, mánadagin 5. december legði Tórálvur Moltr Olsen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir fyri sín part:

I. at talið av kommunulæknum verður 24, harav tveir verða settir í Sandoyar læknadømi.

II. Álagt verður landsstýrinum beinan vegin at heita á innanríkismálaráðharran um at søkja »Folketingets finansudvalg« um játtan av vanliga parti statskassans til føstu løn læknans og vanligu útreiðslurnar í samband við embætið (herundir flytiútreiðslur).

III. Álagt verður landsstýrinum at søkja Tiggjarnevnd løgtingsins um neyðuga játtan av føroyska partinum av útreiðslunum. Um tað

ikki eydnast beinanvegin at loysa málið eftir vanligum reglum, verður landsstýrið at søkja fíggjarnevndina um heimild til at fyrisita og rinda allan kostnaðin av starvssetan, sum verður framd, í samráð við kommunurnar í læknadøminum.

IV. Á komandi fíggjarlóg 1984/85 verður sett játtan samsvarandi útreiðslunum av eini varandi loysn, sum landsstýrið má hava samrátt seg til innan 1. mars 1984.

**Viðmerkingar:**
Sum flestum tingmonnum kunnugt, eru læknaligu arbeiðsumstøðurnar í Sandoynni ótolandi vegna tað støðuga og ikki minkandi arbeiðstrýst, setta kommunulæknanum er fyri, tá hann skal hava vakt 24 tímar í samdøgrið árið runt, bert við oukrari hissini vikuskiftisfrí, har læknaøkið einans hevur læknatænastu til taks yvir telefon.

Í løtuni eru fólk í læknadøminum væl nøgd við sjálva ta læknaligu »servisu«, teim stendur í boði, men óttast, at skilið, sum verið hevur við sera lítlum læknaskifti og longum tíðarskeiðum í læknaloysi, nú aftur verður valdandi, tá eisini verandi lækni, orsakað av ómenniskjansligum arbeiðstrýsti, hevur sagt seg úr starvi.

Í áliti viðvíkjandi kommunulæknaskipanini, sum nevndin, ið sett varð í 1972, legði fram í 1973, verða viðurskiftini í Sandoyar læknadømi eisini viðgjørd.

Har verður m.a. ført fram á bls. 19. og 20:

»*Sandoyar læknadømi* kann sjálvandi ikki bera meira enn tann eina læknan, har eru bert 1650 fólk. Teir lættar, sum koma skulu, noyðast tí — sum roynt hevur verið nú í fleiri ár — at fáast í lag við at samskipa vaktarhaldið og aðra frítíð við kommunulæknarnar í Havn. Sjúkrakassin (ella tann sjúkratrygging, sum kemur í staðin fyri sjúkrakassarnar) má ikki leggja tílíkari skipan trupulleikar í vegin. Reglur mugu gerast sambært sáttmálanum við kommunurnar um fastar viðtalur úti á bygd (serliga í Skúvoy). Læknahúsini á Sandi við viðtaluhøli eru ikki góð, og tá ið einaferð verður farið undir nýggj hús, verður mælt til, at hús og viðtaluhøli verða løgd hvørt sær.«

Eisini verður ført fram í umrøðuni av Suðurstreymoy, at vaktarskipanin ímillum teir 6 læknarnar í Suðurstreymoyar læknadømi má hava Sandslækna uppií.

Løgtingsins sosiala nevnd, sum greiddi álit úr hondum í november 1975, tekur stórt sæð undir við hesum sjónarmiðum og vísir á, at vaktarskiftisskipan fyri Sandoyarlæknan má fáast í rættlag í samband

við teir nýggju kommunulæknasáttmálar, ið koma at verða gjørdir.

Árini 1978-82 er henda nýskipan sett í verk, og mugu nú øll 23 størvini vera sett.

Kortini er eingin broyting komin í viðurskiftini í Sandoyar læknadømi. Tað tykist sum allir nýggir kommunulæknasáttmálar eru gjørdir, uttan at tann skylda til partvísa tænastu í Sandoynni, sum tingmenn hugsaðu um í 1976, er áløgd, og er hon áløgd, so riggar skipanin ikki, tí arbeiðsumstøður sandslæknans eru alsamt versnandi, og tað kann ikki væntast, at broyting fæst í hesi viðurskifti, uttan at ein lækni verður settur aftrat.

Tá menn í 1973 mettu, at sjálvandi kundi Sandoyar læknadømi ikki bera meira enn tann eina læknan, so var hetta avgjørt skeiv meting. Hetta má ásannast í dag 10 ár seinri.

Eisini kann skoytast uppí tað, sum sagt verður: »at í fleiri ár hevur verið roynt at bøta um viðurskiftini«, at hesar royndir vóru uttan úrslit. Og royndirnar næstu 10 árini hava — sum tað sæst — framvegis ikki givið úrslit.

Sambært hjáløgdu skrivum frá kommunulæknanum og landslæknanum til landsstýrið, ríkisumboðsmannin, kommunurnar og onnur, er heilt greitt, at brúk er fyri tveimum læknum. Hesum taka kommunurnar í læknadøminum undir við við skrivi frá 8. juli 1983. Tær hava sostatt góðtikið at rinda sín part av útreiðslunum í samband við eina nýsetan.

Fyri landskassan og statin er ikki talan um stóra fíggjarliga sparing, og kann hann tí ikki forða fyri eini setan.

Hvørt inntøkugrundarlagið við einum fólkatali uppá umleið 1.800 er nóg stórt til, at lønin verður so sámulig, at umsøkjarar verða til bæði størvini, má tíðin vísa.

Verða størvini ósett, má liggja tann skylda á løgtingi og landsstýri, at lønarviðurskiftini verða javnað á neyðugan hátt, men helst verða serlig tiltøk óneyðug, tí fólkatalið er vaksandi í oynni.

Umhugsaða »amanuensisskipanin« hevði verið ein lítil bati, men hendan kom ikki, og er nú avleiðingin vorðin, at læknin hevur sagt upp.

Einasta gongda leið til trygging av viðurskiftunum er tí, at beinan vegin verður ásett eitt fast læknastarv aftrat í Sandoyar læknadømi.

1. viðgerð 9. december. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 16. mars 1984 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er lagt fram á ting av Javnaðarflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 9. december 1983 beint í sosialu nevndina.
Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan Sundstein, Eli Nolsøe og Fredrik Olsen) ásannar, at tann skipan , sum nú verður fingin í lag um at ein kommunulækni í Havn (Ammanuensis) fær eina fasta vaktarskipan við Sandoyar læknar, og verður staddur á Sandoynni, meðan hann hevur vakt har, kann nýtast sum ein fyribils loysn.

Meirilutin heitir tó á landsstýrið um at arbeiða víðari fyri, at Sandoyggin kemur at fáa tveir kommunulæknar.

Meirilutin setir tí fram hetta

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Landsstýrið verður biðið um at skipa fyri, at ein kommunulækni afturat verður settur í Sandoynni, og at 6. kommunulæknastarvið í Suðurstreymi (umframt ammanuensisstarvið) verður sett.

Minnilutin (Jóannes Dalsgaard og Karin Kjølbro) tekur undir við uppskoti Javnaðarfloksins og mælir til at samtykkja tað.

2. viðgerð 21. mars. Framlagt varð broytingaruppskot frá minnilutanum í fíggjarnevndini (Karin Kjølbro og Jóannes Dalsgaard).

Uppskot til samtyktar.

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

So leingi tveir kommunulæknar ikki eru settir í Sandoyar læknadømi, verður settur ein praksishjálparlækni hjá kommunulæknanum á Sandi.

Hesin hjálparlækni verður løntur av Føroya Landsstýri eftir vanligum lønarreglum fyri slíkar læknar..

Málið varð útsett, til ávísar kanningar vórðu gjørdar.

29. mars 1984 legði sosiala nevdin fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

Løgtingið samtykkir, at til kommunulæknastarvið í Sandoyar læknadømi verður sett eitt ammanuensisstarv.

**Viðmerkingar:**
Nevndin metir, at loysnin av hesum máli er setan av ammanuensis á Sandoynni, tá ið fast kommunulæknastarv aftarat ikki kann setast í løtuni.

Nevndin hevur sett broytingaruppskot í samsvar við hetta til fíggjarløgtingslógina 1984/85.

Sama dag, 29. mars, fór fram 2. viðgerð. Upprunaliga uppskotið fall við 13-0. Broytingaruppskot frá sosialu nevndini varð samtykt við 25-0 atkvøðum.

---

# 30. Loyvi til fiskifør heimahoyrandi í Týska Demokratiska Lýðveldinum (DDR) til at veiða svartkjaft á sjóøki Føroya í 1984.

Ár 1983, mánadagin 5. december legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið viðløgdu semju dagf. 25. no-

vember 1983 um sínámillum fiskirættindi í 1984 millum Føroyar og Týska Demokratiska Lýðveldið (DDR).

**Viðmerkingar:**
Heilt síðan at fiskimarkið varð flutt út á 200 fjórðingar í 1977, hevur Týska Demokratiska Lýðveldið biðið um og fingið loyvið til at reka svartkjaftaveiðu í føroyskum sjógvi.

Í 1980 byrjaði føroyskur toskafiskiskapur í Eystrasalti og varð tá sett sum treyt fyri fiskiskapin hjá skipum úr Týska Demokratiska Lýðveldinum undir Føroyum, at føroyingar fingu eina toskakvotu á teirra havøki.

Í 1980 fingu føroyingar eina kvotu uppá 400 tons av toski á landleiðini hjá DDR, og DDR fekk eina kvotu uppá 2.800 tons av svartkjafti undir Føroyum.

Í 1981 fingu føroyingar eina kvotu upp í 800 tons av toski á landleiðini hjá DDR, og DDR fekk eina kvotu uppá 6.600 tons av svartkjafti undir Føroyum. Loyvda skipatalið hjá DDR varð samstundis hækkað úr 2 í 3. Samstundis varð skipatalið hjá føroyingum hækkað úr 3 í 5. Av kvotuni uppá 800 tons av toski kundu 400 tons av toski verða skift um við sild í lutfallinum 2-3, t.d. upp í 600 tons av sild.

Í 1982 fingu føroyingar eina kvotu uppá 975 tons av toski á landleiðini hjá DDR, og DDR fekk eina kvotu uppá 8.000 tons av svartkjafti undir Føroyum. Av tí hækkaðu kvotuni kundu 500 tons av toski verða skift um við sild í lutfallinum 2-3, t.e. upp í 750 tons av sild. Talið av Føroyskum skipum varð samstundis hækkað úr 5 í 7.

Í 1983 fingu føroyingar eina kvotu uppá 1.300 tons av toski á landleiðini hjá DDR, og DDR fekk eina kvotu uppá 10.000 tons av svartkjafti undir Føroyum. Av toskakvotuni kundu 650 tons verða skift um við sild í lutfallinum 2-3, t.e. upp í 975 tons av sild. Føroyska skipatalið varð samstundis hækkað úr 7 í 10.

Á fundi í Keypmannahavn tann 25. november 1983 ímillum umboð fyri Føroya landsstýri og danska uttanríkismálaráðið øðrumegin og umboð fyri fiskivinnumyndugleikarnar hjá DDR hinumegin varð funnið fram til hjáløgdu semju um sínamillum fiskiskap millum Føroyar og DDR fyri 1984.

Sambært hesi semju verður kvotan av svartkjafti til DDR tann sama sum í 1983, nevniliga 10.000 tons. Loyvda skipatalið verður eisini óbroytt, 4 før.

Føroyska toskakvotan verður eisini tann sama sum í 1983 nevniliga 1.300 tons. Av hesi kvotu kunnu 650 tons av toski verða skift um við síld í lutfallinum 2-3, t.e. upp í 975 tons av síld. Talið av føroyskum skipum verður tó hækkað úr 10 í 15, av hesum førum hava tó í mesta lagi 10 loyvi at fiska samstundis á landleiðini hjá DDR.

Semja var um, at fiskiskapurin hjá báðum pørtum kann byrjað 1. januar 1984.

Partarnir vilja royna at gjøgnumføra notuskifti áðrenn 1. februar 1984 og at byrja samrøður um sínámillum fiskiskap í 1985 ella í longri tíðarskeið í oktober 1984.

1. viðgerð 8. december. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 9. december legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram 5. december 1983 og við 1. viðgerð 8. december 1983 beint í Marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan Olsen,Jørgen Thomsen, Jógvan Sundstein, Arne Ziskasen og Hilmar Kass) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Petur Reinert og Erlendur Patursson) førir fram fylgjandi:

Við fyrstu viðgerð av hesum máli segði løgmaður, at í hesum sáttmála var einki nýtt samanborið við tilsvarandi sáttmála í fjør. Hetta er rætt, tí við hesum sáttmála verður hildið fram við at avreiða burtur av svartkjaftastovni okkara fyri spottprís í upp aftur størri muni enn higartil. Roknað í ráfiskavirði — og upp aftur meir roknað í útflutningsvirði — verður vanbýti okkara við hesum sáttmála upp aftur størri enn tað nakra tíð hevur verið. Vit lata DDR nógv størri virði, enn vit fáa aftur fyri frá hesum landi.

Sjónligt er, at samband er millum svartkjaftasáttmálar okkara við eystanlondini og støðu landsstýrisins viðvíkjandi okkara egnu svartkjaftaveiðu og svartkjaftavirking. Í fjør fekk tjóðveldisflokkurin tingið til at áleggja landsstýrinum at leggja fyri løgtingið miðvísa ætlan um svartkjaftaveiðu og svartkjaftavirking okkara. Landsstýrið legðist á boðini, og hevur nú í fleiri ár lagt sína køvandi hond á bygging av svartkjaftavirkjum í Kollafirði og Gøtu.

Politikkur Landsstýrisins er tí tann, at vit skulu halda okkum frá at fáa úrtøku burtur úr tí svartkjafti, sum svimur á landleið okkara til tess at Sovjet og onnur eystanlond skulu fáa so mikið meir í sín part. Til tess at lætta upp aftur betur undir hendan avreiðingarpolitikk, fáa so sovjetisk veiðuskip frítt at umvæla á føroyskum skipasmiðjum.

Somuleiðis vita vit, hvussu landsstýrið hevur latið seg stýra av EEC-krøvum um smáar meskaviddir og snørdar trolposar — og við avmarking í laksaveiðu okkara á føroysku landleiðini.

Niðurstøðan verður tí tann, at landsstýrið ongan sjálvstøðugan fiskivinnupolitikk eigur. Føroyskur fiskivinnupolitikkur verður stjórnaður úr Kreml og Bruxelles — og har omaná hava vit so gongdina við niðurfisking av botnfiskastovnunum.

Tjóðveldisflokkurin vil ikki eiga lut í slíkum oyðileggingarpolitikki, og tó at hesin sáttmáli bert er ein lítil partur í hesum politikki, kann flokkurin ikki góðtaka hann í hesum líki.

Soleiðis sum viðurskiftini alsamt eru í fiskivinnu okkara, kann tað hinvegin forsvarast at hava sáttmálar av hesum slagi, men teir mugu gerast á heilt øðrum grundarlagi, nevniliga soleiðis at javnbýti verður millum tað, ið vit lata, og tað, ið vit fáa aftur fyri. Men slíkt er sum nevnt ikki tilfellið her. Tjóðveldisflokkurin má tí mæla tinginum frá at góðtaka uppskot landsstýrisins.

Eisini heldur Tjóðveldisflokkurin tað vera skeivt at viðgera henda sáttmaála, áður enn vit vita um aðrar sáttmálar. Hesir fiskiveiðusáttmálar mugu allir viðgerast undir einum og í senn; tí tá fyrst hava vit líkindi til at meta um tað møguliga gagn, ið vit fáa burtur úr slíkum sáttargerðum.

Í staðin fyri uppskot landsstýrisins setir Tjóðveldisflokkurin fram soljóðandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

1. Løgtingið áleggur landsstýrinum at taka upp nýggjar samráðingar við DDR um sínámillum fiskiveiðusáttmála á tí grundarlagi, at javnbýti verður millum tað, ið vit lata DDR, og tað, ið vit fáa aftur fyri.
2. Allir fiskiveiðusáttmálar okkara við onnur lond verða av løgtinginum viðgjørdir í senn og undir einum.

2. viðgerð 15. december. Uppskotið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum. Uppskot til samtyktar frá minnilutanum í marknaðarnevndini fall við 7-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1500-1-11-3.

---

# 31. Ljósføring fyri bilar, sum koyra millum bygdir.

Ár 1985, hósdagin 8. december legði Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um ljósføring hjá bilum, sum koyra millum bygdir.**

**§ 1.** Tá koyrt verður millum bygdir í dagsljósi, skulu nærljósini altíð vera tendrað.

**§ 2.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om lysføring for biler ved kørsel mellem bygder.**

**§ 1.** Ved kørsel mellem bygder i dagslys, skal nærlysene altid være tændt.

**§ 2.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Sum øllum kunnugt økjast ferðsluóhappini óhugnaliga nógv her á landi, og hava vit skjótt heimsmet í ferðsluóhappum.

Tað er tó ikki bert í bý ella á bygd, at hesin sorgarleikur fer fram, men okkara landsvegir krevja eisini sín stóra part av ferðsluskaðum.

Landsvegirnir eru ofta svingandi og kringlutir, so oftast hevur bilførarin nóg mikið við at konsentrera seg um tað næra vegastrekkið og sostatt ofta ilt við, at nóg tíðliga gerast varin við mótgangandi ferðslu. Serstakliga tá hesin onga lykt hevur tendraða.

Ofta er sýnið vánaligt, um tað ikki eftir lógini krevur lyktatendring. Og við koyring á landsvegi kemur tú ofta at koyra beint ímóti sólini, sum kemur undan, og hevur tú ofta ilt við at síggja mótgangandi bil í sólarglæmuni, so her høvdu nærijósini verið sera hent.

Ein og hvør, sum hevur koyrt millum bygdir, veit fullvæl, at um mótgangandi akfar førir ljós, so ger tað allan munin fyri at síggja og gerast varur við hann í góðari tíð. Havast má eisini í huga, at stórur partur av okkara landsvegum fyri ein part eru bert einsporaðir, bert ein koyribani, hóast tað eisini á slíkum vegastrekkjum er loyvt at koyra við 80 km/t.

Í flestu øðrum londum, sum hava lutvís munandi færri ferðsluóhapp enn vit, er langt síðan lógarfest, at nærljós skulu nýtast á øllum landsvegum í øllum veðri og øllum sýni.

Allir svenskt bygdir bilar tendra nærljósini automatiskt, tá tú setir tendringslykilin í, og tey kunnu ikki sløkkjast so leingi lykilin er í.

At hava nærljósini lýsandi — tendrað — millum bygdir í øllum koyrilíkindum, kostar bilføraranum einki. Og um — hvat eg ikki ivist í — at slík lógarsamtykt, sum her fyriliggur kemur í gildi, kann føra til, at færri verða løstað ella dripin í ferðsluni, so hevur løgtingið víst sína ábyrgd.

Eg vóni tí, at hetta lógaruppskot hesu ferð fær fulla undirtøku frá tingmonnum, sjálvt um tað fall seinast, tað var fyri, tá uttan nakra frágreiðing, hví tingmenn ikki tóku undir við tí.

1. viðgerð 15. december. Málið varð beint í lóganevndina, sum 29. mars legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð framlagt av Ova Mikkelsen, Løgtingsmanni, tann 8. december 1983 og við 1. viðgerð 15. december 1983 beint í lóganevndina.

Eftir uppskotinum verður mælt til at áseta við lóg at nýta nærljós, tá koyrt verður millum bygdir.

Nevndin hevur lagt málið fyri Ráðið fyri Ferðslutrygd til ummælis, og hevur ráðið í skrivi 15. mars 1984 svarað soljóðandi:
»Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur á starvsnevndarfundi viðgjørt bræv tykkara, dagfest 23.02.84, og metan ráðsins er, at tað, at nýta ljós, hevur týdning fyri trygdina í ferðsluni.

Men starvsnevndin metir eisini, at tað er ikki heilt trygt at nýta nærljós alt samdøgrið, tí nærljósið er ísett soleiðis á bilinum, at tað strálar frameftir (blindar). Eru fleiri bilar saman, ið koyra við nærljósi, kann eitt ljóshav verða fylgjan av tí, og í hesi ljósglæmuni hvørva fólk, ið eru til gongu. Nógv dømi eru um tað, at skaði hevur staðist av júst hesi orsøk. Millum bygdir er hesin vandin kanska minni.

Tað, ið londini uttan um okkum gera, tá ið tey krevja ljósførslu alt samdøgrið, er, at ísett verður í bilarnar eitt koyriljós, sum ikki strálar frameftir, men situr aftan klárt glas og lýsir væl, og bilurin sæst eisini væl. Hetta ljósslag er innbygt í svenskt-bygdar bilar, og kann byggjast inn í onnur merki eisini. Vit vilja í hesum sambandi vísa á støðuljós (parkering), at tey eru bert til at nýta, tá ið bilur stendur.«

Nevndin hevur viðgjørt málið og heldur, at kunngerðin um útgerð hjá bilum eigur at verða broytt soleiðis, at kravt verður, at bilar, ið verða skrásettir fyrstu ferð, t.d. aftná 1. januar 1985, skulu hava koyriljós, sum verða tendrað automatiskt, tá ið motorurin fer í gongd. Viðvíkjandi eldri bilum eigur at verða ásett ein hóskandi longri freist, áðrenn hesir eiga at fáa ísett koyriljós.

Vísandi til frammanfyri setir ein samd nevnd fram fylgjandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at broyta kunngerð um útgerð hjá akførum soleiðis, at bilar innan hóskandi tíðarfreist skulu hava ísett koyriljós.

Framhaldandi 2. viðgerð 27. apríl 1984. § 1 fall við 3-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar var samtykt við 20-0 atkvøðum. Málið sostatt avgreitt.

# 32. Bann móti allari trolveiðu á økinum 12 fjórðingar úr landi vestan fyri Suðuroynna.

Ár 1983, fríggjadagin 9. december legði Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, vegna Hilmar Bech og seg sjálvan fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um bann móti allari trolveiðu á økinum 12 fjórðingar úr landi vestan fyri Suðuroynna.**

§ 1. Á økinum vestan fyri Suðuroynna út á 12 fjórðingar úr landi verður ikki loyvt at nýta nakað slag av troli alt árið.

§ 2. Undantaksloyvi kann bert gevast Fiskirannsóknarstovuni at nýta trol til ávísar avmarkaðar vísindaligar kanningar og royndir.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om forbud mod al trawlfangst i området 12 sømil fra land vest for Suderø.**

§ 1. I området vest for Suderø ud til 12 sømil fra land bliver ikke tilladt at bruge nogen form for trawl hele året.

§ 2. Dispensation kann kun gives Fiskirannsóknarstovan til at bruge trawl til visse begrænsede videnskabelige undersøgelser og forsøg.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

1. oktober 1983 sendu útróðrarfelagini í Suðuroy hjálagda bræv til Føroya Løgting viðvíkjandi hesum máli, og talar brævið fyri seg.

Fyri bygdir sum Famjin og Sumba er útróður einasta vinna, hesar bygdir hava, og hava menn her sett stóran pening í opnar maskinbátar lutvíst við almennum stuðli — eins og tað almenna hevur gjørt stórar iløgur fyri at bøta um lendingarviðurskiftini á hesum báðum tiltiknu

brimplássum. Alt gjørt í bestu meining og eftir besta bygdarmenningarpolitikki.

Landsstýrið hevur sett bann fyri troling innan fyri 12 fjórðingar úr landi, men hevur tó á hvørjum ári givið undantaksloyvi til troling frá mai til august fyri teir bátar, sum hava loyvi at trola á landleiðini. Trolbannið varð ásett fyri at verja ungfiskin, sum heldur til á hesum øki, kanska eitt tað ríkasta »smáfiskaøkið« á landleiðini.

Tí tykist tað at vera høpisleys hugsan frá landsstýrisins síðu, tá teir samstundis geva loyvi til, at allur hesin trolflotin, 25-30 bátar, leggjast á hettar øki ár um ár, vitandi — ella áttu at vita — at lutfalsliga største veiðan hjá hesum trolarum, sum liggja á 6 fjórðinga markinum, væl innanfyrti teir opnu bátarnar, er hýsuhvølpar og toskamurtur.

Fyri bygdir sum Sumba og Famjin ger hetta óskil, at alt sum eitur útróður er deyðadømt, og harvið einasta vinna hesar bygdir áttu, tikin frá teimum. Tí á vetri og um várið eru dagarnir, sum flotast kann, skjótt taldir vegna brim. Líkaleiðis hava so allar íløgur frá monnum í bátar, reiðskap og neyst, kommunalar íløgur til lendingar, vegir til lending, eins og allar almennar íløgur á hesum øki verið til fánýtis.

Hettar undantakstrolloyvi vestan fyri Suðuroynna rakar ikki bert bygdirnar á vestursíðuni, men alla oynna frá Sandvík til Lopra, sum sæst á undirskriftunum á viðlagda brævi. Og sjálvandi eru tað ikki bert opnir bátar, sum serstakliga hava havt góðan útróður á hesum leiðum, men eisini teir minnu útróðrarbátarnir, sum hvørki fáa snellu ella línu niður vegna trolbátarnar, sum ikki bert veiða eina mest smáfisk, men eisini styggja allan flotfiskin burtur av allari leið. Tað er flotfiskin og sildafiskin, teir opnu bátarnir eina mest veiða — altso størri fisk.

Vónandi skilja allir tingmrnn hesa hættisligu støðu — bæði fyri Suðuroynna og fyri ungfiskin hjá nú niðurfiskaðum stovnum, og taka væl undir við hesum okkara uppskoti.

1. viðgerð 24. januar 1984. Málið varð beint í fiskivinnunevndna, sum 21. mars legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er framlagt 9. december 1983 av tingmonnunum Ova Mikkelsen og Hilmar Bech og við fyrstu viðgerð 24. januar 1984 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið tann 19. mars 1984 og vísir á, at sambært løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978 § 4 við seinri broytingum er tað landsstýrið saman við løgtingsins fiskivinnunevnd, sum taka støðu til, um og hvar, undantaksloyvi verða givin at fiska við troli innan fyri 12 fjórðingamarkið.

Viðmerkjast kann, at løgtingsins fiskivinnunevnd onga tilráðing hevur fingið frá landsstýrinum og heldur onga umsókn frá felagsskapum ella einstaklingum um loyvi at trola innan fyri 12 fjórðingar í 1984. Um loyvi skal gevast at trola innan fyri 12 fjórðingar í 1984, so vil fiskivinnunevndin viðgera hetta út frá einum heildarsjónarmiði og ikki einstakar partar og setir tí einki uppskot fram.

2. viðgerð 23. mars. Uppskotið, § 1, fall við 4-0 atkvøðum.

---

# 33. Bygging av ferju til strandfarasiglingina.

Ár 1983, fríggjadagin 9. december legði Hans M. Joensen, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**

**løgtingslóg um bygging av ferju til strandfarasiglingina.**

**§ 1.** Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka upp neyðug lán til bygging

**lagtingslov om bygning af færge til kystfarten.**

**§ 1.** Landsstyret hemyndiges til på landskassens vegne at optage nødvendige lån til bygning af

av ferju at røkja sigling til Sandoynna.

§ 2. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at útvega detailprosjekt og tilboð viðvíkjandi bygging av ferju til siglingina Skopun-Tórshavn.

§ 3. Henda lóg fær gildi beinan vegin.

færge til varetagelse af sejladsen til Sandø.

§ 2. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at tilvejebringe detajlprojekt og tilbud vedrørende bygning af færge til sejladsen Skopun-Tórshavn.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Tá »Ritan« varð bygd í 1971, varð hetta eitt stórt framstig fyri samferðsluna millum Sandoynna og meginlandið, men tíðir broytast og so er her eisini. Vit hava nú í 3 ár havt eina royndarsigling við »Tróndi« um summarið Tórshavn - Skopun og hevur tað vist seg at her er ein stórur tørvur, sum ikki verður rokkin av teimum skipum, sum røkja rutuna í dag, tað kann t.d. nevnast, at trýstið á bilflutning var so stórt seinasta summar, tá »Tróndur« var í sigling Tórshavn-Skopun, at tað kom ofta fyri, at hann ikki fekk tikið allar bilarnar við, eftir upplýsingum frá Strandferðsluni var flutningurin av bilum uml. tvær ferðir so nógvur ímillum Sandoynna og Tórshavn sum millum Skálafjørðin og Tórshavn teir 95 dagarnar, hann røkti rutuna til Sandoynna. Bilflutningurin býtti seg soleiðis upp:

| | |
|---|---|
| Tilsamans ..... | 2.718 bilar |
| í meðal pr. dag ..... | 29 - |
| max. ein dag ..... | 61 - |
| min. ein dag ..... | 11 - |

Ferðafólkatalið hesar 95 dagarnar var hetta:

| | |
|---|---|
| Tilsamans ..... | 11.346 fólk |
| í meðal pr. dag ..... | 118 - |
| max. pr. dag ..... | 300 - |
| min. pr. dag ..... | 35 - |

Sjóleiðin er einasti høvuðsvegur, sum Sandoyggin hevur við megin-

økið, og má tað tí haldast at hesin høvuðsvegur má vera á einum so góðum støði, sum til ber, um tí ídnaði, sum hevur tikið seg upp í oynni tey seinastu árini, bæði innan sjóvinnu og landbúnaðin, skal verða lív lagað í framtíðini. Mælt verður tí til at bygt verður nýtt skip (bilferja) til at røkja rutuna Skopun-Tórshavn og má hetta skip hava umleið sama flutningskapasitet sum »Tróndur«.

1. viðgerð 15. december. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 10. februar legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 9. december 1983 og undir 1. viðgerð tann 15. december 1983 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi 30. januar 1984 og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Sv. Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen) setir einki uppskot fram, tá landsstýrið arbeiðir við øðrum uppskoti um ferðasamband til Sandoynna.

Minnilutin (Jørgen Thomsen, Ove Mikkelsen og Adolf V. Hansen) er av teirri áskoðan, at tilskilað skal verða í lógini, at føroyskar skipasmiðjur skulu útvega detailprojekt og tilboð og setir fram soljóðandi

**broytingaruppskot**

**til**

**uppskot Tjóðveldisfloksins**

| | |
|---|---|
| § 2 verður orðað soleiðis: | § 2 affattes således: |
| »Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at útvega detailprojekt og tilboð frá føroyskum skipasmiðjum viðvíkjandi bygging av ferju til siglingina Skopun/Streymoy.« | »Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at tilvejebringe detailprojekt og tilbud fra færøske skibsværfter vedrørende bygning af færge til sejladsen Skopun/Streymoy.« |

2. viðgerð 17. februar. Atkvøðugreiðsla 22. februar. § 1 fall við 14-0. Broytingaruppskot frá minniluta til § 2 fall við 14-0.

# 34. Sjúkraflutningur við helikoptaranum.

Ár 1984, fríggjadagin 9. december legði Hans M. Joensen, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at skipa so fyri, at helikoptarin, sum keyptur er til landið, yvirtekur sjúkraflutningin, sum »Reyði Krossur« hevur nú, bert við teimum undantøkum, tá floglíkindi ikki eru.

**Viðmerkingar:**
»Reyði Krossur« sum higartil fyri tað mesta hevur verið brúktur til sjúkraflutning frá Sandoy, Skúvoy, Nólsoy, Hestoy, Koltri er við tíðini blivið eitt gamalt og ótíðarhóskandi far til slíkan flutning, báturin er meir enn 40 ár gamal við maskinu, sum er meir enn 20 ára gomul, hetta førir við sær, at túrurin til dømis millum Skopun og Tórshavn, sum við rutuni vanliga tekur ein tíma, men sum við læknabátinum ikki er óvanligt at brúka bæði tveir og tríggjar tímar, tá líkindini ikki eru av teimum bestu, hesi viðurskifti hava í fleiri ár verið so ótolandi, at t.d. læknin í Sandoyar læknadømi í flestu førum, ella tá tað hevur verið møguligt, hevur latið sjúklingarnar flyta við rutubátinum, sum í allar flestu førum hevur verið »Ritan«.

Ritan hevur bert havt tað brek, at hon einki sjúkralugar hevur, soleiðis at børa við sjúklingi hevur einki annað pláss havt uttan at standa í salongini ímillum alt ferðafólkið til stóran ampa bæði fyri sjúklingin og tey ferðandi, hetta óskilið má fáa ein enda og tað ongantíð ov skjótt, eg vil tí seta fram hetta uppskot til samtyktar.

1. viðgerð 15. december. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 16. mars legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av Hans Marius Joensen, løgtingsmanni, 9. december 1983 og undir 1. viðgerð 15. í sama mánaði beint í sosialu nevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan Sundstein, Eli Nolsøe og Fredrik Olsen) metir, at enn eru nógvir praktiskir trupulleikar við at skipa fyri føstum sjúkraflutningi við helikoptaranum. Hinvegin eigur tyrlan at vera nýtt í so stóran mun sum møguligt til hetta endamál.

Meirilutin setir tí fram hetta

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Heitt verður á landsstýrið um at skipa so fyri, at landsins tyrla í so stóran mun sum møguligt verður nýtt til annars óhøgligan sjúkraflutning.

Minnilutin (Karin Kjølbro og Jóannes Dalsgaard) tekur undir við uppskotinum og mælir til at samtykkja tað, tó við teirri viðmerking, at læknabátarnir ikki eiga at verða niðurlagdir. Í aðru syftu tekur minnilutin undir við uppskoti meirilutans.

2. viðgerð 21. mars. Uppskotið fall við 16-0 atkvøðum. Meirilutauppskotið frá nevndini varð samtykt við 30-0 atkvøðum.

---

# 35. Fíggjarløgtingslóg 1984/85.

Ár 1983, hósdagin 15. december legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

# uppskot
# til
# fíggjarløgtingslóg 1984/85.

*Sí skjøl 7 A-B.*

**Viðmerkingar til fíggjarløgtingslógina 1984/85.**

Uppskotið til fíggjarløgtingslóg 1984/85 er vorðið til á sama hátt sum undanfarin fíggjarlógaruppskot.

Teir stovnar, sum fyrisita landsins pening, hava fingið boð um at gera teirra metingar av tørvinum á játtanum fyri komandi fíggjarár.

Eins og seinast hevur landsstýrið álagt stovnunum at gera metingar um lønarútreiðslurnar út frá teim lønum, sum vóru galdandi 1. juli 1983 og teim aldursviðbótum og lønarviðbótum, sum tá vóru avtalaðar at galda í komandi fíggjarári og haraftrat leggja upp fyri 4 prístalsviðbótum.

Til hetta er at siga, at fleiri lønarsáttmálar, eitt nú við Starvsmannafelagið, vórðu endurnýggjaðir aftan á at stovnarnir høvdu latið uppskotið til fíggjarlógina inn og er sostatt ikki tikin hædd fyri lønarhækkingum orsakað av nýggju sáttmálunum.

Fyri aðrar útreiðslur enn lønir er metingin gjørd út frá prísum galdandi 1. juli 1983 + 10%.

Innkomnu uppskotini frá stovnunum hava síðani verið viðgjørd í landsstýrinum. Undir viðgerðini hevur verið lagdur dentur á:

1. at avmarka útreiðsluvøksturin hjá almennu stovnunum,
2. at halda aftur við almennum íløgum, tó soleiðis at hetta í minst møguligan mun førir vinnuloysi við sær,
3. at meta um útreiðslurnar so neyvt sum gjørligt til tess at sleppa undan ov stórum játtanum á eyka fíggjarløgtingslóg og
4. at fíggja alt alment virksemi úr landskassanum heldur enn við lántøku.

Fíggjarløgtingslógaruppskotið 1984/85 javnvegar við 1.271.295.000 kr. í mun til núgaldandi fíggjarløgtingslóg, sum javnvegar við 1.113.615.000 kr. Her er sostatt talan um ein vøkstur upp á 14,2%.

Hesa ferð hevur eydnast landsstýrinum at leggja uppskot til fíggjarløgtingslóg fyri tingið, sum javnvegar uttan lántøku.

7. Við hesum í huga kann verða náttúrligt at sammeta fíggjarløgtingslógaruppskotið við tað, sum núgaldandi fíggjarløgtingslóg javnvegar við nevndliga 1.113.615.000 kr. og hartil leggja lánsheimildina, sum er 58 mió. kr. Hetta er 1.171.615.000 kr., og tá er ikki

talan um ein vøkstur, sum áður nevnt upp á 14,2%, men 8,5 %.

2. Inntøkur landskassans eru mettar til 663 mió. kr. Hesar eru roknaðar út frá teirri í heyst samtyktu lóg um ásetan av skatti til landskassan at galda fyri samtíðarskattin og inntøkuna í 1982 + 22%. Í mun til álíkningina í 1983 er talan um ein vøkstur upp á 13,3%. Inntøkurnar av tollgjøldum eru mettar út frá teim 1. december 1983 fyriliggjandi tølum, hækkað við 4%.

Eisini hesa ferð er roynt at gera eina 3-ára fíggjarætlan. Umframt at gera eina meting av inntøkum og útreiðslum komandi fíggjarár, er gjørd ein meting av hesum upphæddum ávikavist fyri 85/86 og 86/87 í 84/85-krónum. Av hesum tølum fæst ein hóming av landsstýrisins ætlan, tá um fíggjarviðurskifti ræður trý ár fram.

Fíggjarløgtingslógin 84/85 verður nú løgd fyri tingið, so sum stýrisskipanarlógin fyrisetir. Undir viðgerðini í fíggjarnevndini verður høvi at koma á tal við landsstýrið, sum er til reiðar at koma við ájourførdum tølum og metingum um búskaparligu gongdina og hvørja ávirkan, hesi kunnu væntast og eiga at hava á fíggjarløgtingslógina.

1. viðgerð 2. februar. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 28. mars legði fram soljóðandi

**álit**

*Sí skjal 7 C*

**Viðmerkingar til álitið.**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 15. december 1983 og undir 1. viðgerð tann 2. februar 1984 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarløgtingslógaruppskotið 1984/85 javnvegar við kr. 1.271.295.000 í mun til núgaldandi fíggjarløgtingslóg, sum javnvegar við kr. 1.113.615.000. Her er sostatt talan um ein vøkstur upp á 14,2%.

Í fyriliggjandi lógaruppskoti er eingin lántøka heimilað. Sammett við galdandi fíggkjarlóg og lániheimild í § 4 uppá kr. 58. mió., er vøksturin tá ikki 14,2%, men 8,5%.

Landsstýrið nevnir í viðmerkingunum til lógaruppskotið, at § 1-1108: Vanligur landsskattur er mettur til kr. 663.000.000. Hetta tal er roknað út frá lógini um ásetan av skatti til landskassan at galda fyri samtíðarskattin og inntøkurnar í 1982 + 22%. Í mun til 1983 er ein vøkstur upp á 13,3%. Tollurin er mettur út frá tølunum 1. december 1983 + 4%. Fyri fíggjarárið 1985/86 og 1986/87 hevur lands-

stýrið sett upp mett tøl.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt lógaruppskotið á sama hátt sum undanfarnu ár. Har tørvur hevur verið fyri at lýsa ávís viðurskifti, eru upplýsingar útvegaðar, og í nøkrum førum hava landsstýrismenn, stovnsleiðarar og aðrir verið á fundi til tess at greiða frá og svara spurningum í tilknýti til avvarðandi greinir í fíggjarlógaruppskotinum.

Harumframt hava verið fundir við peningastovnarnar, Búskaparráðið og Føroya Fiskasølu.

Um § 1 — skattir hevur stjórin fyri Líkningarráð Føroya mett, at upphæddin í uppskoti landsstýrisins er forsvarlig.

Samlaða upphæddin kr. 700.500.000 metist bein; tó væntaðist sjónmansskatturin ikki at røkka uppskotna talinum.

Samtíðarskattaskipanin, ið byrjar 1. apríl 1984 varð umrødd, og fekk fíggjarnevndin eina frágreiðing um gongdina í løtuni.

Um § 2 — toll- og framleiðslugjøld metti stjórin fyri Føroya Gjaldstovu, at inniverandi ár gevur 540 mió kr. og at fyriliggjandi uppskot frá landsstýrinum kemur at halda.

Fyri fíggjarnevndina er tað av áhuga at fáa at vita frá teimum, ið eru serkønir í fíggjartættunum í vinnulívi okkara, hvussu teir meta fíggjarliga gongdin í búskapi Føroya var í 1983 og um útlitið fyri 1984.

Í fleiri ár hava hesir fundir verið við peningastovnarnar, Búskaparráðið og Fiskasøluna og tað skal ásannast, at uppslýsingar eins og orðaskiftir hava hjálpt til at tekna eina so beina mynd sum gjørligt av ikki bert tí, ið farið er fram í árinum frammanundan, men eisini — og tað er tað umráðandi — hvussu komandi árið kann fara at roynast, serliga við at vísa á tey viðurskifti, ið eru avgerandi og vega mest.

Her er neyðugt at gera skynsamar metingar og hetta kundi verið uppaftur torførari, um ymiskar áskoðanir og metingar vóru um viðurskiftini. Um kønir menn og nevndir vóru ósamdir um aðalmálini, vildi hetta inniborið eina enn større ábyrgd fyri støðutakanina hjá játtandi myndugleikunum.

Tað hevur víst seg, at eingin ósemja er um aðalmálini. Vinnu- og búskaparumboðini hava veitt teirra niðurstøður, og úrslitið skal í stuttum setast upp soleiðis:

Fyri fiskivinnuna var 1983 rakstrarliga gott. Orsøkin var vaksandi veiðunøgd, serliga á egnum leiðum og bligari útgerð. Tey góðu úrslitini á hesum øki øktu stórt um úttlutningsvirðið. Í mun til innflutningin er, tá skipini verða hildin uttanfyri, mest sum javnvág á gjaldsjavnanum. Í 1983 metti Fiskasølan ein vøkstur uppá 10%, men tá

avlornaði var talið 25%. Móti ársenda 1983 fullu fiskaprísirnir tó nakað.

Í mun til 1983 metir Fiskasølan um 1984 at tað er torført at meta um úrslitið fyri 1983 verður rokkið og kunnu orsøkirnar fara at verða at dollarin møguliga fellur, Íslands-kvotan er skerd og generelt prísfall kann koma fyri.

Ein 0-vøkstur í 1984 í útflutningsvirðinum er, um so verður, ein gongd, ið vil innibera búskaparligar avleiðingar. Málið fyri samfelagið má vera at útflyta mest møguligt til best møguligar prísir og at kostnaðaurin fyri hetta er so lágur sum gjørligt.

Íløgurnar verða fíggjaðar heima og uttanlands. Viðmerkjast skal, at talan fyrst er um høvuðsvinnuna — fiskivinnan. Tað er skip og flakavirkir v.m. og t.d. góðskingarvirkir. Slíkar fíggingar skulu rindast. Um uttanlandslánini er at siga, at tað er ikki komið fyri, at landskassin ikki hevur goldið sum ásett, eisini sum kautionistur.

Rakstrarsíðan kann verða merkt av, at fløgusíðan er tung at fíggja.

Ein 0-vøkstur í fiskivinnuni kann fara at geva eitt tálmandi úrslit fyri alt okkara sera viðkvæma fíggjarsafelag; kelduskattaskipanin vil vísa í tølum møguligar broytingar.

Stuðulsskipanin til fiskivinnuna fer — um framvegis óbroytt — at seta krøv, ið skulu rindast.

Búskaparráðið metir, at uttanlandsskuldin ultimo 1984 verður 2,45 til til 3 mia. kr., og at rentubyrðan verður tá umleið 250 mió. kr. árliga.

Til landskassan og ávísar landsstovnar er útvegað lógarheimild at endurfíggja verandi lán.

Tey uttanlandslán, ið landskassin, landsstovnar og aðrir hava tikið við ávísum lógarheimildum, hava við einum undantaki (serlán til fiskiskip umleið 60 mió. kr.) verið nýtt til fløgur.

Tað er ein sannroynd, at føroyska samfelagið ikki í dag var so framkomið, um ikki hesi lán vóru tikin. Og verða hesi lán afturrindað sum ásett.

Samanumtikið má sigast, at í eitt longri tíðarskeið hevur fløgutátturin verið sera týandi og hevur hetta verið gagnligt fyri samfelag okkara.

Íløgur eiga framvegis at fara fram, men skynsamliga.

Undir viðgerðina í fíggjarnevndini av inntøkusíðuni hevur meirilutin fingið ta meting av hesum viðurskiftum, at eftir teimum útvegaðu upplýsingum, er orsøk til at vænta, at § 1 — skattur og § 2 — toll- og framleiðslugjøld koma at geva eina ávísa meirinntøku í mun til uppskot landsstýrisins.

Í hitt borðið hevur meirilutin mett, at umstøðurnar hjá fiskivinnuni í komandi fíggjarári fara at vera soleiðis, at neyðugt verður at økja um stuðulin til fiskivinnuna.

Tann stórskaði, ið hendi á havnir og lendingar í ódnarveðrinum tann 22. januar 1984 inniber øktar útreiðslur fyri landskassan, tí neyðugt er alt fyri eitt at umvæla skaðarnar og styrkja um.

Samanumtikið metir meirilutin sostatt, at tað er forsvarligt at hækka inntøkuupphæddirnar í uppskoti landsstýrisins, men hesin peningur má leggjast út aftur til umrøddu útreiðslur.

Umframt eru ávís átrokandi mál, sum meirilutin í fíggjarnevndini metir eiga at fáa sømdir. Útvarp Føroya hevur tørv fyri nýggjum millumbylgjusendara. Her hevur meirilutin hækkað uppskotið frá landsstýrinum. Somuleiðis kann nevnast, at meirilutin er av tí áskoðan, at trýstið á ávísar grunnar hjá tí almenna er so stórt, at neyðugt er at hækka uppskotnu játtanirnar.

Her verður hugsað um grunnin til endurnýgging av fiski- og farmaskipaflotanum, ídnaðargrunnin, menningargrunnin og húsalánsgrunnin.

Meirilutin hevur umhugsað møguleikarnar fyri at bøta um fíggjarligu viðurskiftini hjá teimum, sum eru undir útbúgving, og hevur skotið upp, at ávísur grunnur verður stovnsettur til slíkt endamál og at hesin grunnur fær eina hækkaða játtan í mun til teir verandi. Sostatt er skotið upp, at settur verður grunnur uppá 3 mió. kr. til útbúgving í staðin fyri verandi grunn til lærdan lestur og verandi grunn til annan lestur. Landsstýrið ger reglugerð fyri henda grunn og skal henda reglugerð góðkennast av fíggjarnevndini.

Havandi í huga, at síðani uppskot landsstýrisins varð lagt fram, eru gjørdir nýggir lønarsáttmálar, hevur meirilutin í fíggjarnevndini verið afturhaldandi við at avmarka og skera niður játtanirnar til stovnarnar soleiðis, at hesir við sparitiltøkum á tann hátt hava umstøður til at fíggja meirkostnaðin.

Í tilknýti til at meirilutin í fíggjarnevndini mælir til at játtanin til Í.S.F. verður hækkað, heitir hesin meiriluti á Í.S.F. um at hava gamlan føroyskan sið í huganum um at hvílidagurin verður nýttur eftir ætlan, og at so lítið virksemi sum møguligt fer fram henda dag.

Vísandi til frammanfyri standandi viðmerkingar setir meirilutin (Ivan Johannesen, sv. Åge Eflefsen, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen) fram hesi

**broytingaruppskot**

**§ 1. Skattur**

1108Vanligur landsskattur
Hækkaður við 20.500.000 kr.
Greini sett til ..... kr. 721.000.000,-

**§ 2. Toll- og framleiðslugjøld**

2017 Tollgjøld
Hækkað við 16.500.000 kr.
Greinin sett til ..... kr. 580.500,-

**§ 10. Løgtingið**

10505 Landsskattanevnd
Konto 233561. Aðrar skrivstovu-útreiðslur
Hækkað við 1.000 kr.
Greinin sett til ..... kr. 9.521.000,-

**§ 11. Landsfyrisitingin**

11103 Fiskivinnustova
Konto 103143, lækkað við 50.000 kr.
Settur verður **næmingur.**
Greinin sett til ..... kr. 78.095.000,-

**§ 12. Heilsumál**

12202 Klaksvíkar sjúkrahús
Játtaðar verða 200.000 kr. til lækna í kirurgi
Greinin sett til ..... kr. 101.777.000,-

**§ 13. Samferðslumál**

1) Nýggir vegir og brýr v.m.
Fast samband um Haraldsund verður sett til 6.500.000 kr. í staðin fyri 8.000.000 kr.
Sett til kr. 125.700,-

2) Havnagerð í grunn
Verður lækkað við 1.000.000 kr.
Sett til kr. 44.000.000.

3) Lendingar í grunn
Verður hækkað við 1.000.000 kr.
Sett til 19.000.000 kr.

6) Berghols- og brúgvagerð í grunn
Verður lækkað við 7.000.000 kr.
Víst verður til viðmerkingar landsstýrisins til § 13.6, bls. 111 í skjølunum. Yvirskotið verður kr. 69.000.000 í staðin fyri kr. 48.000.000. Til bergholsgrunn kr. 23.000.000 í staðin fyri kr. 16.000.000.

11) Nýggj konto
Sett til 5.000.000 kr.
Víst verður til viðmerking til § 13.11.
Greinin er sett til ..... kr. 215.200.000,-

## § 14. Skúlamál

14053 Felagsútreiðslur fyri skúlaverkið.
Víst verður til
§ 15-323116: Skúlabókaútgáva

14307 Føroya Sjómansskúli,
konto 113243 kr. 50.000 strikað

14409 Klaksvíkar Sjómansskúli
konto 113243 kr. 10.000 strikað

14656 Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð kr. 1.199.000 strikað

14901/313128: Studningur til ÍSF
Hækkað við kr. 75.000

14953/313152: Verður broytt til:
Grunnur til útbúgving
Sett til kr. 3.000.000,-

14953/313177 verður strikað

14953/313368 Føroya Skúlasavn
Verður hækkað við kr. 100.000,-
Greinin sett til ..... kr. 118.032.000,-

**§ 15. Vísindi, bókmentir og list**

15508 Bygdasøvn
lækkað við 50.000 kr.

323157 Útvarpsstøðir í grunn
Hækkað við 2.000.000 kr.
Greinin sett til ..... kr. 43.731.000,-

**§ 16. Fiskivinna, sigling o.t.**

16018 Vrakarastovnur
Konto 103048 rættað
til kr. 1.400.000
Sostatt sett til kr. 2.010.000

16208 Sjómansheim
Hækkað við kr. 250.000

16301 Vaktar- og Bjargingartænasta
Hækkað við kr. 1.367.000 til
fyribyrgjandi tiltøk móti
oljudálkingum

16904/333011 Kanning av dálking
**Viðv. kr. 400.000,-**
Djóralækni, ið er settur verður
at løna undir Heilsufrøðiligu
Starvsstovuni í góðkendari nor-
mering, sí bls. 206 í skjølunum.
Tær 400.000 kr. verða nýttar til løn
til laborant og til keyp av kanning
av dálking í samband við laksa- og
sílaaling.

16904/33017 Minstaløn og annar stuðul
til fiskivinnuna
Hækkað við kr. 30.000.000,-

16904/33025 Stuðul til grunn til endur-
nýgging av fiski- og farmaskipa-
flotanum
Hækkað við kr. 5.000.000,-

16904/333033 Grindir
Lækkað við kr. 30.000,-
Greinin er sett til ..... kr. 291.726.000,-

**§ 17. Landbúnaður og matrikulering**

17103 Konto 253306
Lækkað við kr. 500.000,-
Greinin er sett til ..... kr. 32.353.000,-

**§ 18. Handil, ídnaður o.t.**

18152 Brandvenjingarstøðin við Áir
Hækkað við kr. 681.000,- til
liðugtgerð av skúlabygningi.
18907/353026 Stuðul til ídnaðarfremjandi
endamál.
Hækkað við kr. 2.000.000,-
18907/353042 Menningargrunnurin
Hækkað við kr. 2.000.000,-
18907/353083 Orkugrunnur
Lækkað við kr. 5.000.000,-
Greinin er sett til ..... kr. 33.266.000,-

**§ 19. Almannamál v.m.**

19904/363636 Fráhaldsfeløg
Hækkað við kr. 50.000,-
19904/363685 Húsalánsgrunnur
Hækkað við kr. 2.000.000,-
Greinin er sett til ..... kr. 214.374.000,-

Minnilutin (Atli P. Dam) førir fram:

Fíggjarlógin 1980/81 javnvegaði sambært landskassarokningini við 693 mió. kr., meðan fíggjarlógin 1984/85 kemur at javnvega við 1.435 - 1.450 mió. kr. T.v.s. at tað hevur eydnast »sparilandsstýrinum« hetta valskeið at meira enn tvífalda tær upphæddir, tiknar verða frá skattgjaldarum og brukarum.

Landskassans inntøkur svara nú snøgt sagt til alt útflutningsvirðið, sum í fjør var 1.550 mió. kr., soleiðis at samfelagið verður rikið við donsku statstilskotunum, uttanlandslánunum og »muftiplikatoreffektini« av hesum og útflutninginum.

Verður so hugsað um, at inntøkur landskassans verða tiknar av reallønum, sum eru nógv skerdar somu fýra árini, er ikki løgið, at borgarin kennir tað økta skatta- og tolltrýstið sera nívandi.

Kendi borgarin aftur fyri, at honum beyðst eitt økt tænastustøði og/ella at landskassin var konsolideraður, soleiðis at hann framvegis betri orkar at standa ímóti og betur kann nøkta tey krøv, eitt nú høvuðsvinnan setir, so kundi hann kanska vónað at nakað rúmkaðist aftur hjá honum so við og við. Men so leingi stýri okkara er samansett sum tað er, er tvørturímóti væntandi, at skeiva gongdin heldur fram við skjótari og skjótari ferð.

Eitt stýri, sum ongantíð orkar at stíga úr rossasporum í broyting og útbygging av samfelagnum, kann ikki fremja ta nýskapan og endurnýgging, sum skal til, skal samfelagið kunna framleiða seg burturúr tí tronga, lánsbyrðan og hallið mótvegis útheiminum setir okkum í, í væntan hevur borgarin tí bert ein landskassa, ið støðugt bólgnar av tómgangskrónum, meðan neyðug nýskapan verður køvd í samgonguklandri ella »nysseliga« pakkað inn í pakkar, sum ongan áhuga hava fyrr enn »komandi jóla«.

Tá samfelagsáhugamálini soleiðis verða innilæst í ymsum pakkum við eitt nú tretivu skipum, trimum bergholum, fyritnuni ella byrðu til ávísan samfelagsbólk, familju ella einstakling, einum studentaskúla ella eini orkuútbygging, so er bert vinnulugt vónloysi í væntu.

Ein meginorsøk til bólgnanina av fíggjarlógini var hugmóð landsstýrisins og fíggjarmálaráðharrans, tá »busjetteringin varð broytt soleiðis, at stovnarnir í forhond skuldu innrokna allar hækkingar, teir kundu finna uppá ella hugsa sær, tí eftirjáttan bleiv eingin — eykafíggjarlógin skuldi takast av — tí ráddi um hjá stovnunum at leggja væl upp fyri.

Men sjálvandi kom á hvørjum ári ein eykafíggjarlóg nærum eins stór og vanligt, t.v.s. 100-120 mió. kr.

Áður vórðu lagdar teprar fíggjarætlanir, sum vórðu eftirjavnaðar við eykafíggjarlóg, men samanlagt vóru karmarnir trengri og tamarhaldið ti alt í alt betri.

Á fyriliggjandi fíggjarlóg er mannagongdin nú aftur broytt, lønarvøksturin er ikki íroknaður, og torir samgongan sostatt ikki at sýna allar avleiðingarnar av hugmóðini í 1982. Men tær 30 milliónirnar, sum resta í til lønir, verða so eini komandi samgongu at ábyrgjast í eykafíggjarlógini 1984/85.

Eitt fyribrigdi, sum hevur eyðkent fíggjarlógartosið — ella eykafíggjarlógartosið — seinastu trý árini, eru tey stóru »avlop«, samgongan hevur reypað av mótvegis hallinum uppá 20 mió, kr. í 1080/81.

Hendan talan hevur bert týdning, um gjørt verður greitt, hvørjar fortreytir liggja undir henni. Verunleikin er, at landsstýrið og samgongan hava grovt undirbusjetterað inntøkurnar nú í trý ár. Harvið eru fingin til vega nøkur óverulig — fiktiv — avlopstøl. Í verunleikanum hava hesi avlop hvørt ár verið nýtt í forhond. Men til tess at avdúka hetta, er neyðugt at hava í huga skipanina við grunnum, landsstýrið brúkar burturúr uttan at hetta í fyrstu syftu sæst á fíggjarlógini. Haraftrat skal havast í huga, lánini, landsstýrið letur ymsar stovnar upptaka, ístaðin fyri at játta teim pening yvir fíggjarlógina.

Tað, sum sostatt eyðkennir fíggjarpolitikkin hjá sitandi samgongu er, at ein fjalir tey pyntaðu líkini á lógini við »kammuflasju« samstundis sum gullkálvadansurin verður tráddur harðliga og harðmæltari enn fyrr.

Taka vit t.d. fíggjarlógirnar seinastu trý árini og sammeta samgonguuppskotini, meting minnilutans (Atli Dam) og tær verunligu inntøkurnar — t.v.s. tað. sum er lagt á borgaran — so er úrslitið hetta í mió. kr.

| | Samgonga | Atli Dam | Verunlig tøl |
|---|---|---|---|
| 1981/82 | 748 | 784 | 844 |
| 1982/83 | 944 | 957 | 1.001 |
| 1983/84 | 1.107 | 1.158 | 1.210-1.240 |

Henda talvan sýnir, at so sum so er við fíggjarligu dømikraft samgongunnar, serliga tá lagt verður aftrat, at avlopini, verið skuldu, eru nýtt í forhond.

Harvið falla eisini skuldsetingarnar móti javnaðarflokkinum fyri í uppskotum sínum at mæla til ovurnýtslu til jarðar, tí øll uppskot

floksins, hava ligið innanfyri karmin í fíggjarlógarmeting minnilutans. Uppskotini miðaðu sostatt ímóti at ávísa skilagóð endamál fyri avlopspeningi, ístaðin fyri at lata hann renna burtur millum fingrar landsstýrisins. Frammanundan hevði jú alt tos um, at ov nógv varð kravt inn í tolli og skatti og tos um hækkandi skattatrýst, verið sópað av borðinum.

Á fyriliggjandi fíggjarlóg er lagið hitt sama. Inntøkurnar eru aftur undirmettar meira enn 125 mió. kr. samstundis sum avlopið frá 1983/84 ikki er tikið við á slíkan hátt, at t.d. lagt er í aftur teir grunnar uttanfyri fíggjarlógina, sum brúkt er úr ella ov lítið lagt í, t.d. eykagrunn ráfiskagrunsins, húsalánsgrunnin, menningargrunnin, íbúðagrunnin og aðrar, har veitingarnar hava staðið við í áravís og sostatt eru inflatiónsminkaðar ár um ár.

Nýtslan í 1983/84 úr ráfiskagrunninum verður góðar 103 mió. kr. og úr eykagrunninum slakar 36 mió. kr. Av hesum 139 mió. kr. verða tær 31 mió. kr. at játta á eykafíggjarlógini 1983/84, meðan eykagrunnurin — katastrofugrunnurin — missir 36 + 12 = 48 mió. kr., sum hann skuldi átt at staðið ímóti við um prísgongdin verður lakari, ella veiðunøgdin pr. veiðueind minkar. At hesin peningur er burtur, má metast sera ábyrgdarleys fíggjarstýring. Nú er samgongan í teirri heppnu støðu, at okkara partur av tjóðbankaavlopinum verður einar 42 mió. kr., ella 37 mió. kr. meira enn roknað við, soleiðis at til hevði borið — við serligari samtykt um nýtsluna av hesum peningi — at lagt ein munandi part í aftur eykagrunnin, ið sjálvsagt eisini eigur at fáa serliga veiting í 1984/85, helst 12 + 13 mió. kr.

Talað hevur hugmóðiga verið um fíggjarlóg 1984/85 uttan lántøku, løgið mátti tað kenst og illa máttu orðini smakka í munni teirra, sum júst í hesum døgum royna at reisa eitt alment lán uppá 85 mió. kr. uttanlands, sum vegna Menningargrunn, Húsalánsgrunn, Telefonverk og aðrar almennar stovnar og grunnar helst skulu reisa annað slíkt, samstundis sum teir, sum víst á hava tømt ella hálvtømt fleiri grunnar. Men her ber so til at fjala verunleikan fyribils. Tørvandi fyriskipanarevnini koma kortini at sýna seg í gjaldsjavnahalli og uttanlandsskuld seinni.

Búskaparráðið metti í fíggjarnevndini, at gjaldsjavnahallið í 1984 lættliga kann gerast 700-800 mió. kr. og uttanlandsskuldin harvið meira enn 3.000 mió. kr. Tá verður avdúkað, at eins og samgongan í síni heild hevur skúgvað flestu spurningar og vandamál frammanfyri sær, so skúgvar hon sín part av uttanlandsskuldini yvir á aðrar. Tað verður ikki tespiligt at taka við aftaná eitt stýri, sum við faldaðum

hondum hevur latið skuldina vaksa úr 870 mió. kr. upp um 3.000 mió. kr. — ella 60.000 kr. í meðal pr. íbúgva.

Rímiligari hevði verið at væntað, at peningaríkiligheitin hesi ár hevði verið nýtt til at bøtt um gjaldsjavnahallið.

Í inntøkumeting minnilutans er tikið við, at partafelagsskatturin gevur 20 mió. kr. eyka og at skattur teirra, sum fyrstu ferð skatta og teirra, sum leingja skattalív sítt við einum ári frádrigið munin millum seinasta aktiva skattaárið og skatting eftir grein 22 A gevur einar 24 mió. kr. eyka. Tí eru eisini umstøður at bøta viðurskifti teirra ungu munandi meira enn samgongan ætlar, eitt nú yvir Húsalánsgrunnin, útbúgvingarstuðulin, serlig tiltøk móti ungdómsarbeiðsloysi og annað.

Inntøkumeting minnilutans sæst best av rakstraryvirlitinum 1984/85:

| | | Inntøkur<br>Indtægter | Útreiðslur<br>Udgifter |
|---|---|---|---|
| § 1 | Skattir<br>Skatter | 799.000.000 | |
| § 2 | Toll- og framleiðslugjøld<br>Told- og fremstillingsafgifter | 620.000.000 | |
| § 3 | Onnur gjøld<br>Andre afgifter | 1.200.000 | |
| § 4 | Inntøkur av spæli<br>Indtægter ved spil | 800.000 | |
| § 5 | Rentur og vinningsbýti v.m.<br>Renter og udbytte m.v. | | 55.000.000 |
| § 6 | Landsstovnar<br>Landsvirksomheder | | 85.000.000 |
| § 7 | Partur av avlopi danska tjóðbankans<br>Andel i den danske Nationalbanks overskud | 15.000.000 | |
| § 8 | Ymsar inntøkur<br>Diverse indtægter | | +20.000.000 |
| | | | 160.000.000 |
| | Nettoinntøka/Nettoindtægt | | 1.276.000.000 |
| | | 1.436.000.000 | 1.436.000.000 |

Tá talið í § 8: Ymsar inntøkur er broytt til útreiðslu uppá 20 mió. kr., er hetta gloymda lønarhækkingin. Harí er roknað hækkingin innan

strandferðsluna, meðan aðrir landsstovnar eru á § 6, har roknað er við øktari útreiðslu 5 mió. kr.

Inntøkan á § 1 verður at minka við 25 mió. kr., verður uppskot javnaðarfloksins um hækking í pensjónsfrádráttinum samtykt.

Til tær einstøku greinirnar hevur minnilutin annars hesi uppskot og viðmerkingar:

**§ 1 Skattur**

| | | |
|---|---|---|
| 1108 | Vanligur landsskattur | kr. 761.500.000 |
| | Greinin sett til | kr. 799.000.000 |

**§ 2 Toll- og framleiðslugjøld**

| | | |
|---|---|---|
| 2017 | Tollgjøld | kr. 605.000.000 |
| 2707 | Framleiðslugjøld | kr. 15.000.000 |
| | Greinin sett til | kr. 620.000.000 |

**§ 6 Landsstovnar**

| | | |
|---|---|---|
| 6014 | Strandfaraskip Landsins | ÷ kr. 40.000.000 |
| | Greinin set til | ÷ kr. 85.000.000 |

Vegna lønarhækking 6,5—7% hækkar konto 6014, haraftrat kemur tyrlurakstur o.a.

**§ 7 Partur av avlopi danska tjóðbankans**

| | | |
|---|---|---|
| 7011 | Partur av avlopi danska tjóðbankans | kr. 15.000.000 |
| | Greinin sett til | kr. 15.000.000 |

Í meðal hevur hetta avlop seinastu trý árini verið 28 mió. kr. árliga. Má tí vera rætt at ajourføra hetta tal nakað.

**§ 8 Ymsar inntøkur**

| | | |
|---|---|---|
| 8105 | Ymsar inntøkur | ÷ kr. 20,000.000 |
| | Greinin er sett til | ÷ kr. 20.000.000 |

Ongastaðni er avsett sáttmálabundna lønarhækkingin, sum fyri ymsu stovnarnar (undantikið postverk, telefonverk og apotek) eru útvið 20 mió. kr. Samgongan mælir til sparingar á ymsum stovnum, men hvør skilatingmaður veit, at so nógv kann ikki sparast innan rakst-

urin. T.d. skal landsskrivstovan eftir hesum spara 24,1% av rakstrarútreiðslunum — húsaleiga, el, hiti, telefon, telex o.s.fr. — tá verður eingin telefon, einki telex og afturlatið fyri hitanum. Gjaldstovudeildin í Klaksvík skal spara allar rakstrarútreiðslurnar fyri at vinna fyri lønarhækkingina, t.v.s. hon noyðist at lata aftur, tá lønirnar eru goldnar. Hetta sýnir, hvussu tilvildarliga samgongan roynir at smoykja sær ígjøgnum.

Orsøkin til, at lønarhækkingin er tikin við á hesi grein sum ein minuspostur, er at minnilutin, hóast hann í tveir mánaðir hevur biðið um at fáa lønartølini ajourførd undir teim ymsu greinunum, ikki hevur fingið hesa umbøn eftirlíkaða.

**§ 10 Løgtingið**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 10505 | Tikið verður undir við broytingaruppskoti meirilutans | | |
| Greinin sett til | | kr. | 9.521.000 |

**§ 11 Landsfyrisitingin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 11155 | Uttanríkistænasta í Aberdeen (viðm.) | kr. | 800.000 |
| Greinin sett til | | kr. | 78.433.000 |

Viðmerking til § 11-11155
Herav kr. 300.000 til umvæling og umbygging av ogn landsins í Aberdeen.

Burtursæð frá 11155, har eisini ávís hækkan av útistøðuviðbót og løn eigur at verða, verður tikið undir við uppskotið meirilutans. Tó skal viðmerkjast, at minnilutin ivast í at 2,5 mió. kr. røkka til ferða- og dagpening, tá hesin jú er vaksin munandi undanfarin ár. Eisini eigur at verða álagt landsstýrinum, at yvirtøkan, sum liggur í trygdareftirlitinum á flogvøllinum, ikki verður varandi.

**§ 12 Heilsumál**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 12109 | Landssjúkrahúsið | kr. | 69.754.000 |
| 12202 | Klaksvíkar Sjúkrahús<br>Tikið verður undir við uppskoti meirilutans | | |
| | Greinin sett til | kr. | 101.717.000 |

Ad 12109 Nóg mikið við 1/2 læknaskrivara til yvirlæknan í barnasjúkum.

**§ 13 Samferðslumál**

1. Nýggir vegir og brýr,
2. Havnagerðir í grunn,
3. Lendingar í grunn,
11. Brimgarðar

Her verður tikið undir við uppskotum meirlutans.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 6. | Berghols- og brúgvagerð í grunn | kr. | 0 |
| 9. | Sekunder berghol í grunn | kr. | 0 |
| | Greinin sett til | kr. | 209.200.000 |

Meirilutin hevur roknað við 23 mió. kr. av yvirskotinum 1982/83 í bergholsgrunninum, men orsøkin til, at bert er talað um hetta »avlop« er, at hendan eykafíggjarlóg 1982/83, sum skuldi verið samtykt seinasta summar, er ikki samtykt enn. Helst verður í 1983/84 — hóast risayvirtrekkið á § 16-333017 eitt avlop uppá umleið 40 mió. kr. umfraint tær 37 milliónirnar av avlopi tjóðbankans, so í bergholsgrunninum koma enn 13,3 mió. kr., og er hetta so nóg mikið til at hava trinni berghol og uppfyllingararbeiði í Haraldssundi gangandi í senn. Tað er eingin grund til at hava tær 5 klandursmilliónirnar frá 1982 standandi í serligum grunni, øll berghol skuldu upprunaliga fíggjast úr sama grunni.

**§ 14 Skúlamál**

Tikið verður undir við uppskoti meirlutans viðvíkjandi konto 14053, 14307 og 14409, men ikki við 14656 Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð, har tikið verður undir við uppskotið landsstýrisins.

*14901 Ítrótt*

| | | | |
|---|---|---|---|
| 313128 | Studningur til Í.S.F. | kr. | 1.500.000 |

*14953 Ymiskir studningar*

| | | | |
|---|---|---|---|
| 313162 | Grunnur til útbúgving | kr. | 6.000.000 |
| 313177 | Grunnur til útvegan av undirvísingartilfari og bókum til næmingar við hægri læristovnar í Føroyum | kr. | 2.500.000 |
| 313455 | Ungmannafeløgini ULF og UF | kr. | 250.000 |
| | Greinin sett til | kr. | 123.482.000 |

Tikið verður undir við, at reglugerð verður gjørd fyri grunnin til útbúgving (313152), her verður at samráðast við LFÚ og undirfeløg tess, helst eigur serlig fyrisiting at sita fyri grunninum. Bøkur og undirvísingartilfar eigur at verða ókeypis hjá næmingunum við hægri undirvísingarstovnar í Føroyum, so sum HF- og studentaskúlar, sjómans- og maskinskúlar, tekniskar skúlar, handilsskúlar í tann mun hetta ikki er galdandi, fróðskaparsetur, læraraskúlar o.s.fr.

**§ 15 Vísiudi, bókmentir og list**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 15508 | Bygdasøvn<br>Tikið verður undir við uppskoti meirilutans | | |
| 323037 | Sjónleikur | kr. | 450.000 |
| 323108 | Láni- og studningsgrunnur til bókaútgávu | kr. | 250.000 |
| 323157 | Útvarpsstøðir í grunn<br>Tikið verður undir við uppskoti meirilutans | | |
| 323158 | Rakstrarstudningur til Útvarp Føroya | kr. | 2.800.000 |
| 323228 | Mentunargrunnurin | kr. | 500.000 |
| 373305 | Landsstýrinum at ráða yvir | kr. | 250.000 |
| | Greinin sett til | kr. | 46.931.000 |

Í samband við viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðaranum varð samtykt, at landskassin skuldi rinda rentur og avdráttir av lánum til útvarpshúsið, men hetta noktar meirlutin at akta, men mælir í staðin fyri at hækka útvarpsgjaldið til 630 kr. Minnilutin mælir tó til at láta útvarpinum rakstrarstudning uppá kr. 2.800.000,- hóast rentur og avdráttir eru umleið 5 mió. kr. — so slepst ið hvussu so er undan hækking av útvarpsgjaldinum.

Hækkanirnar á 323108 og 323228 eru neyðugar, skulu nakrir rithøvundar fáa høvi til at arbeiða toluliga óhelt við tilrættalegging av bókaútgávu.

**§ 16 Fiskivinna, sigling o.t.**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 16018 | Vrakarastovnur<br>Tikið verður undir við uppskoti meirilutans. | | |

| | | |
|---|---|---|
| 16208 | Sjómansheim<br>Tikið verður undir við uppskoti meirilutans. | |
| 16301 | Vaktar- og bjargingartænasta<br>Tikið verður undir við uppskoti meirlutans. | |
| 333017 | Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna (viðm.) | kr. 260.000.000 |
| 333025 | Studningur til grunnin til endurnýgging av fiski- og farmaskipaflotanum. | |

Tikið verður undir við uppskoti meirilutans, og víst verður til, at 13 mió. kr, helst koma aftrat, so stóra hallið á hesi konto minkar enn meira. Kortini metir minnilutin framvegis, at meirilutin fyri rentustudningi til farmaskipabygging eigur at samtykkja hesa skipan (sí uppskot til samtyktar).

**333033 Grindir**

| | |
|---|---|
| Tikið verður undir við uppskoti meirilutans | |
| Greinin sett til | kr. 320.726.000 |

Viðm. til § 16-333017
Harav 25 mió. kr. verða at binda í eykagrunni ráfiskagrunsins, inntil hesin er í minsta lagi 120 mió. kr.

**§ 17 Landbúnaður og matrikulering**

Einki broytingaruppskot, tó heldur minnilutin framvegis, at projektið royndarstøð eigur at verða endurskoðað, so kostnaðurin ikki gerst 80-85 mió. kr.

| | |
|---|---|
| Greinin sett til | kr. 32.353.000 |

**§ 18 Handil, ídnaður o.t.**

| | |
|---|---|
| 18152 | Brandvenjingarstøð við áir<br>Tikið verður undir við uppskoti meirilutans. |
| 353026 | Stuðul til ídnaðarfremjandi endamál. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Tikið verður undir við uppskoti meirilutans. | | |
| 353042 | Til Menningargrunn (viðm.) | kr. | 15.000.000 |
| 353083 | Til orkugrunn | kr. | 7.500.000 |

Viðm. § 18-353042:
Harav 5 mió. kr. at nýta til serlig tiltøk at fyribyrgja ungdómsarbeiðsloysi.

Minnilutin heldur ikki, at tað er beint at avmarka vøksturtin í orkugrunninum ov nógv, tí tað hevur serligan týdning, at vit eru før fyri at gera royndir viðvíkjandi alternativum orkumøguleikum.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Greinin er sett til | | kr. | 39.766.000 |

**§ 19 Almannamál v.m.**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 363636 | Frálhaldsfeløg<br>Tikið verður undir við uppskoti meirilutans. | | |
| 363685 | Húsalánsgrunnurin (viðm.) | kr. | 30.000.000 |
| 363694 | Kommunalur útjavningargrunnur (viðm.) | kr. | 20.000.000 |
| 363707 | Arbeiðsloysisgrunnur arbeiðarafelaga | kr. | 800.000 |
| 363708 | Skeiðvirksemi fakfelaganna | kr. | 250.000 |
| 363716 | Føroyingafelagshús í Godthåb | kr. | 100.000 |
| | Greini sett til | kr. | 253.124.000 |

Viðm. til § 19-363685
Harav 5 mió. kr. at nýta til kollegiubygning, kann eftir landsstýrisins avgerð eisini umsitast undir 363777 Næmingaheim í grunn.

Viðm. til § 19-363694
1. gjald av 5-ára játtan, peningurin at binda inntil hesin grunnur er 100 mió. kr.

**§ 20 — § 26**
Sama sum uppskot landsstýrisins. Tó trýr minnilutin ikki uppá, at

§ 22-203507 »Umboðan« greiðist við kr. 500.000, tá brúkið í 1983/84 táttar í milliónina.

| | |
|---|---|
| Samanlagdar útreiðslur | kr. 1.249.903.000 |
| Munur | kr. 26.097.000 |
| | kr. 1.276.000.000 |

Sum tað sæst, er munur uppá 26 mió. kr. og loyvir hetta tann av javnaðarflokkinum uppskotna skattalætta við 1.000 kr. hækkan av pensjónsfrádráttinum.

Tjóðbankaavlopið í 1983 er óvæntað høgt, heilar 37 mió. kr. meira enn mett. Minnilutin skjýtur tí upp, at hesin peningur saman við teim á § 16 játtaðu 25 mió. kr. verður bundin í eykagrunni ráfiskagrunsins inntil hesin er komin upp á 120 mió. kr. Minnilutin setir tí fram fylgjandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**
**um**
**tjóðbankavalopið 1983**

Álagt verður landsstýrinum beinan vegin at leggja fyri tingið lógaruppskot, sum broytir býtið av fíggjarlógaravlopinum soleiðis, at tann parturin av Føroya parti av avlopi tjóðbankans í 1983, sum er størri enn 5 mió. kr, verður lagdur í eykagrunn ráfiskagrunsins. Samstundis verður álagt landsstýrinum at fyriskipa slíkum reglum fyri hesum eykagrunni, at ikki kann nýtast úr honum fyrr enn hann er í minsta lagi 120 mió. kr.«

Í fleiri ár hava arbeiðarafeløgini biðið um at arbeiðseftirlitið varð gjørt til sjálvstøðugan stovn, men er hetta ynski ikki eftirlíkað. Minnilutin setir tí fram fylgjandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**
**um**
**arbeiðseftirlit**

Landsstýrinum verður álagt at sundurgreina játtanina á konto 18109

ímillum Arbeiðseftirlitið og Teknisku Deild Landsins, so hesir stovnar kunnu arbeiða sjálvstøðugt og annars í framtíðar figgjarlógum at taka teir við hvør sær.«

Tá lógin um stuðulslán til farmaskipabygging kom fram, varð greitt, at meirluti fanst í tinginum fyri heldur at veita rentutilskot, tí hesi góvu eitt javnari trekk uppá hendan grunn, sum so ofta stendur við negativari saldo. Nú er útlit til, at hallið á hesum grunni kann minka munandi og var tí skilagott at fyribyrgt framtíðar skarvslopum á saldoini við at broytt stuðulsveitingina.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**
**um**
**rentustuðul til farmaskipabyggingarlán**

Landsstýrinum verður álagt beinan vegin at leggja fyri tingið lógaruppskot, sum miða ímóti at broyta stuðulslánini til farmaskipabygging soleiðis, at rentutilskot eins dugnandi og stuðulslán verða veitt í staðin fyri .

Minnilutans sikti í figgjarlógarmetingini hevur verið at binda tær umleið 125 mió. kr. (162 mió. kr. við tjóðbankaavlopinum) sum inntøkan verður størri enn av samgonguni mett, til skilagóð endamál, men soleiðis at hendan peningaríkiligheit landskassans ikki fær óhepnar og økjandi avleiðingar fyri gjaldsjavnahallið og uttanlandsskuldina. Undanfarin ár hevur samgongan á hvørjum ári nýtt 100-200 mió. kr. meira enn neyðugt av undirbusjetteraðum krónum og lánum, og er hetta ein orsøkin til vaksandi gjaldsjavnahallið. Við at binda umleið 100 mió. kr. í eykagrunni ráfiskagrunsins, kolegiugrunni, grunni til endurnýgging av fiskiskipaflotanum, kommunalum útjavningargrunni og á annan hátt, verður fyribyrgt, at hesin peningur í búskaparligu ringrásini fremur eina avskeplandi gongd í uttanlandsskuldini. Tá er skilagott at veita skattaborgaranum eitt lítið endurgjald uppá 25 mió. kr. fyri hendan stórpening, innkravdur er.

Samgongan verður kanska tortrúgvin um inntøkumetið fyri 1984/85, men her kann vísast á, at hon altíð metti 100 mió. kr. ov lítið - jbr. talvu frammanfyri - - og er nakað hald í samgongumunar tiltrúgv til. at B-skattgjaldararnir ikki fara at skekla skattleggingargrundarlagið við teim møguleikum, samgongan veitti í skiftisreglunum og

skattaútsetanini, so skal inntøkumeting minnilutans nokk standa seg eina ferð enn.

Minnilutin hevur hækkað stuðulin til minstuløn og aðrar stuðulsskipanir upp í 260 mió. kr. og ásannar, at hetta er óheppið — hóast 25 mió. kr. verða bundnar í cykagrunninum — men soleiðis sum samgongan hevur hagreitt okkara ráfiskagrunnskipan við at veita og beina stuðulin til ávís skipasløg og veiðuhættir, sum ávísir persónar — helst vinir og kenningar — vara av, so slepst ikki undan at hækka hendan stuðul, áðrenn ein avmarking og útjavning aftur kann fremjast.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) førir fram:

Í 3 1/2 ár hevur land okkara ligið í stjórnarloysi. Politikkur samgongunnar hevur ikki verið annað enn klandurspolitikkur og rossahandilspolitikkur, har hvør av teimum trimum samgonguflokkunum hava sett heildargagn landsins og fólksins til viks og bert hugsað um at draga sum mest undir síni egnu persóns- og floksáhugamál.

Við hesi fjórðu og seinastu fíggjarlóg samgongunnar sæst fyri endan á hesum stjórnarloysi, og hóskilig skrift á hesum gravsteini kundi tá verið: »Her gavst eingin vón«.

Øll hesi farnu árini hevur tjóðveldisflokkurin borið fram prógv um henda klandurs- og rossahandilspolitikk og boðið sær til at vera við í royndum til at koma burtur úr stjórnarloysinum og í staðin leggja lunnar undir landsgagnligan føroyskan politikk, og lagt fram tilmæli og uppskot um slíkan poltikk. Men allar hesar royndir hava verið til fánýtis.

Tað verður alt ov drúgført at greiða frá øllkum teimum mongu og miklu skeivleikum í fíggjarpolitikki samgongunnar. Í stuttm kann sigast, at øll lyfti samgongunnar viðvíkjandi fíggjarmálum hava verið svikin. Í staðin fyri minking í almennum útreiðslum eru hesar øktar í stórum. Í staðin fyri lætta í skattabyrðunum hava vit fingið øking, serstakliga á lág- og meðalinntøkunum. Í staðin fyri javna í inntøkubýtinum hava vit fingið vaksandi misjavna. Í staðin fyri skynsamligan og miðvísan íløgupolitikk hins almenna og í vinnulivinum hava vit fingið fram-eftir-fummum politikk, soleiðis at serstakliga vinnulívsmynstrið alt er farið av lagi. Í staðin fyri bygdamenningarpolitikk hava vit fingið bygdaavtoftingarpolitikk. Í staðin fyri at samskipa landsins fíggjarorku, hevur landsstýrið nýtt landsins pening til lottarí-spæl mangar túsund kilometrar burtur frá Føroyum. Í staðin fyri minking í uttanlandsskuld er uttanlandsskuldin vaksin í stórum.

Forðað hevur verið fyri, at landsbankin, ið kundi havt verið almikil stuðul í skynsamligum fíggjarrakstri, varð settur á stovn.

Upp móti hesum landsoyðileggjandi klandurs- og rossahandilspolitikki samgongunnar, setir tjóðveldisflokkurin føroyskan fíggjar- og búskaparpolitikk, sum í høvuðsheitum er hesin:

1. Skil verður fingið á teimum donsk-føroysku peningaveitingunum, ið ongan varandi bata veita landi okkara, men bert bera at tí borði um ókomnar tíðir at hava okkum sum ófrælst og ósjálvbjargað uppgávufólk. Hesar peningaveitingar verða í fyrstu atløgu allar umbýttar við eina heildarveiting, ið síðan verður latin minka so hvørt sum ræði okkara yvir egnum viðurskiftum veksur.
2. Øll skattalóggávan verður endurskoða frá botni við tí høvuðsendamáli at skapa rættvísi í skattabyrðunum, soleiðis at lætt verður um byrðarnar á teimum inntøkuveiku og annars soleiðis, at eisini tey inntøkusterku koma undir rímiligan skatt.
3. Toltfrælsi fyri rá- og framleiðsluvørur.
4. Landsbankin stovnaður og rikin sambært lógini.
5. Eitt høvuðsmál í búskaparpolitikkinum verður at leggja íløguætlan fyri ávíst áramál fram í tíðina, bæði viðvíkjandi almennum íløgum og vinnulívsíløgum.
6. Íløguætlan hins almenna eigur at røkka vega- og havnabygging, samferðslu á landi og sjógvi, skúlabygging, sosialar byggingar og yvirhøvur alt alment byggivirksemi.
7. Íløguætlan vinnulívsins eigur fyrst og fremst at miða ímóti skynsamligastu støddd og samanseting fiskiveiðuflotans og støddd og samanseting fiskavirkjanna.
8. Tað verður her bráneyðugt at steðga nýíløgunum í botnfiskiveiðuflotanum og í staðin økja um íløgur í veiði eftir øðrum fiskasløgum, í fiskaaling og í størri góðsking av fiski og fiskaúrdrátti, bæði á núverandi og á nýggjum virkjum.
9. Við rúmari peningajáttanum til Menningargrunn Ídnaðarins verða møguleikar skaptir fyri øktum íløgum í ídnaðar- og handverksfyritøkur. Somuleiðis verður økt um íløgur landbúnaðarins.
10. Eitt annað høvuðsmál í búskaparpolitikkinum verður at varðveita núverandi búsetingarmynstur við virknum bygdamenningarpolitikki, fyrst og fremst við at skapa vinnulívs- og inntøkulíkindi í øllum bygdum landsins.

Í teimum málum, ið her hava verið nevnd — og í fleiri fíggjar- og búskaparmálum við — hevur tjóðveldisflokkurin í farnum árum greitt frá sjónarmiðum sínum og lagt fram lógar- og onnur uppskot teimum viðvíkjandi, men alt hevur hetta verið sópað av borðinum, meðan samgongan hevur latið hesi mál rekast fyri vág og vind. Fíggjarlógaruppskotið 1984-85 er bert framhald av tí skilatoysispolitikki, sum nú hevur verið rikin í 3 1/2 ár, og tjóðveldisflokkurin ger sær ongar vónir um nú í evstu løtu at fáa veruliga vend í. Kortini setir tjóðveldisflokkurin fram nøkur broytingaruppskot til uppskot samgongunnar, og eru tey hesi:

Av tí at ungdómurin sum heild, nú samtíðarskatturin kemur í gildi, verður tann, sum ringast kemur fyri, og at landskassin nú í ár fær eina eyka inntøku frá ungfólki uppá 30-40 mió. kr., mælir minnilutin til, at hendan upphædd kemur ungdóminum beinleiðis til góðar á fíggjarlógini við at 20 mió. kr. verða lagdar til Húsalánsgrunnin, harav tær 5 mió. kr. skulu nýtast til kollegiubygging, at grunnurin til lærdan lestur fær heitið: Grunnur til útbúgving og fær 6 mió. kr., eins og Menningargrunnurin fær 10. mió. kr. eyka, sum skulu nýtast til serlig arbeiðsskapandi tiltøk móti ungdómsarbeiðsloysi.

Sostatt setir minnilutin (Ove Mikkelsen) fram fylgjandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

| | | |
|---|---|---|
| § 6-6306 | Útvarpið ..... til rentur og avdrátt til útvarpshúsið, so óneyðugt verður at hækka útvarpsgjaldið | 2,8 mió. kr. |
| § 14-313152 | fær broytt navnið til: »Grunnur til útbúgving« .... | 6,0 mió. kr. |
| § 15-323157 | Útvarpssendistøðir í grunn .. MB-sendari kann byrja | 5,0 mió. kr. |
| § 16-16018 | Vrakarastovnurin ..... verður hækkaður við einari mió. kr., nú stovnurin skal til | 3,0 mió. kr. |

at góðskumeta allan fisk og fiskaúrdrátt til útflutnings.

§ 16-333017 Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna ..... 233,0 mió. kr.
harav 30 mió. kr. verða nýttar til umlegging av fiskiflotanum.

§ 18-18109 Arbeiðseftirlitið .....
At lønir og aðrar útreiðslur til virðismetingararbeiði hjá landsstýrinum ikki verða tiknar av hesari konto.

§ 18-35042 Menningargrunnur ..... 25,0 mió. kr.
harav 10 mió. kr. skulu nýtast til serlig arbeiðsskapandi tiltøk ímóti ungdómsarbeiðsloysi.

§ 18-353083 Orkugrunn ..... 5,0 mió. kr.

§ 19 Húsalánsgrunnur ..... 30,0 mió. kr.
harav 5 mió. kr. skulu nýtast til kollegiubygging.

§ 19-353043 (nýtt stk.) Bygdamenning ... 10,0 mió. kr.

Hetta vil tilsamans geva eina eyka útreiðslu uppá 92,0 mió. kr.
**Flutt** ..... 92 mió. kr.

Henda upphædd kemur soleiðis innaftur:

§ 18-35083 Orkugrunnurin minus 5 mió. kr.

§ 7-7071 Partur av avlopi danska tjóðbankans smb. lóg verður at geva ikki 5, men 25 mió. kr.

Tilsamans ..... 30 mió. kr.

Írestar ..... 62 mió. kr.

sum er 5 mió. kr. minni upphædd enn seinasta eykafíggjarløgtingslóg 1983/84 gav í yvirskoti, og metir minnilutin, at mettur skattur og tollur á fíggjarlógini 1984/85 ikki fer at geva minni yvirskot enn í fjør, tá eykafíggjarlógin gav 67 mió. kr. í yvirskoti.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) setir fram soljóðandi:

**I**

**uppskot til**

**løgtingslóg um tryggingarfrælsi.**

**§ 1.** Fyri at geva fólki møguleika fyri at spara, har sum sparast kann í samband við, at gingið verður yvir til samtíðarskatt, verður uttan mun til reglurnar í § 1 í løgtingslóg nr. 24 frá 28. mars 1956 um trygging loyvt herbúgvandi føroyingum og feløgum, skrásett í Føroyum, at stovna

a) sínámillum tryggingarvirksemi,
b) endurtryggingarvirksemi.

**§ 2.** Tey, ið stovna tryggingar sambært § 1 skulu lúka tær í altjóða konventiónum givnu reglur fyri trygging.

**§ 3.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om forsikringsfrihed.**

**§ 1.** Med det formål at tilvejebringe muligheder for borgerne at spare der, hvor der spares kan, i tilknytning til overgangen til kildeskattesystemet tillades herved trods regelen i § 1 i lagtingslov nr. 24 af 28. marts 1956 om forsikring herved herboende færinger og selskaber, der er registreret på Færøerne at etablere

a) gensidig forsikringsvirksomhed,
b) genforsikringsvirksomhed.

**§ 2.** Den, der etablerer forsikringsvirksomhed i henhold til § 1 skal kunne overholde de betingelser, der er fastsat i internationale forsikringskonventioner.

**§ 3.** Denne lov træder i kraft straks.

**II**

**Uppskot**
**til**

**løgtingslóg um kappingaruppsparing.**

§ 1. Loyvt verður føroyskum borgarum at taka lut í uppsparingarkapping landsins.
*2. stk.* Kappingaruppsparingarkonto skal verða í føroyskum peningastovni.
*3. stk.* Reglurnar fyri uppsparingarkappingini eru hesar:

Landskassin sparir somu upphædd í sama peningsstovni sum borgarin.
*4. stk.* Báðar uppsparingarkonti skulu vera til hægstu rentu sum fæst.
*5. stk.* Av rentuinntøkuni á landskassans konto verða 1. árið 2% góðskrivað uppsparingarkonto, 2. árið 3%, 3. árið 4%, 4. árið 5%, 6. og fylgjandi ár 6%.
*6. stk.* Hægst loyvda uppsparing áðrenn renta er kr. 1.000, hvønn mánað, og skal avleidd av egnari inntøku.

§ 2. Landskassans partur av uppsparingini kemur um fíggjarløgtingslógina.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

**lagtingslov om konkurrenceopsparing.**

§ 1. Det er tilladt for færøske borgere at deltage i landets opsparingskonkurrence.
*Stk. 2.* Konkurrenceopsparingskonto skal i givet fald etableres i færøsk pengeinstitut.
*Stk. 3.* Reglerne for opsparingskonkurrencen er følgende:

Landskassen opsparer samme beløb og i samme pengeinstitut som borgeren.
*Stk. 4.* Begge opsparingskonti forrentes med højst opnåelig renteindsats.
*Stk. 5.* Af renteindtægten hidrørende fra landskassens konto skal 1. år 2% krediteres borgernes opsparingskonto, 2. 3%, 3. 4%, 4. år 5% og det 6. og følgende år 6%.
*Stk. 6.* Højst tilladte opsparing før renter er kr. 1.000 hver måned, og skal hidrøre fra borgerens indtægt.

§ 2. Landskassens andel af opsparingen tilvejebringes over lagtingsfinansloven.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

III

## Uppskot til løgtingslóg um likviditetshjálpargrunn.

§ 1. Stovnsettur verður likviditetshjálpargrunnur til frama fyri ung, sum áðrenn tey eru farin í vinnu, eru komin í skuld, ið er orsakað av tørvandi inntøkum í læru og lestrartíð ella øðrum grundargóðum ávum.
*2. stk.* Grunnurin fær inntøku sína yvir fíggjarløgtingslógina.

§ 2. Grunnurin fær 5 limir og verða hesir:
1 limur valdur av landsstýrinum (formaður),
1 limur valdur av løgtinginum,
1 limur valdur av landsskúlafyrisitingini,
1 limur valdur av peningsstovnunum, og
1 limur valdur av líkningarvaldinum.
*2. stk.* Starvstíð nevndarinnar er valskeið løgtingsins.

§ 3. Nevndin ger reglugerð fyri grunnin, ið skal góðtakast av landsstýrinum og fíggjarnevnd løgtingsins.

§ 4. Henda lóg kemur í gildi 1. aprfl 1984.

## Uppskot til lagtingslov om likviditetsstøttefond.

§ 1. Der etableres en likviditetsstøttefond til fordel for unge, som før de har fået beskæftigelse, har pådraget sig gældsforpligtelser af manglende indtægter i lære- og studietid eller af lignende velbegrundede årsager.
*Stk. 2.* Fonden får sine indtægter over finanslagtingsloven.

§ 2. Fonden får 5 følgende medlemmer:
1 valgt av landsstyret (formand),
1 valgt af landsskoleadministrationen
1 valgt af pengeinstitutterne,
1 valgt af ligningsrådet.
*Stk. 2.* Udvalgets funktionstid er lagtingets valgperiode.

§ 3. Udvalget udfærdiger reglement for fonden, hvilket skal godkendes af landsstyret og af lagtingets finansudvalg.

§ 4. Denne lov træder i kraft 1. april 1984.

**IV**

**Uppskot til løgtingslóg um húsalánshjálpargrunn.**

§ 1. Stovnsettur verður húsalánshjálpargrunnur við tí endamáli at langfreistað annuitetsendurfíggingarlán til húsaeigarar, sum orsakað av samtíðarskattaskipan eru komin í fyribils trongstøðu.
*2. stk.* Lánsupphæddin er avmarkað til eina og hvørja tíð samlaða falnu skuld í gjaldføri orsakað av teim tilskilaðu orsøkum ikki er tøkt.
*3. stk.* Grunnurin fær sína inntøku yvir fíggjarløgtingslógina.

§ 2. Húsalánshjálpargrunnurin kann bert veita lán til ánarar, ið átt hava avvarðandi ogn í minni enn 5 ár.

§ 3. Grunnurin fær 5 limir umboðandi fylgjandi:
1 fyri landsstýrið (formaður)
2 fyri Húsalánsgrunnin,
2 fyri Sparikassarnar.
*2. stk.* Starvstíð nevndarinnar er valskeið løgtingsins.

§ 4. Nevndin ger reglugerð fyri grunnin, ið skal góðtakast av landsstýrinum og fíggjarnevnd løgtingsins.

**Uppskot til lagtingslov om boliglånshjælpefond.**

§ 1. Der etableres et bolighjlpefond med formålet at yde langfristede annuitets refinancieringslån til huscjere, som på grund af den nye kildeskat er kommet i midlertidige financielle vanskeligheder.
*Stk. 2.* Lånebeløbet er begrænset til den til en hver tid faldne gæld, som der mangler likviditet forårsaget af de forannævnte begrundelser.
*Stk. 3.* Fonden får sine indtægter over finanslagtingsloven.

§ 2. Boliglånshjælpefonden kan kun yde lån til husejere, der har ejet vedkommende hus i mindre end 5 år.

§ 3. Fonden får 5 medlemmer som følger:
1 for landsstyret (formand),
2 for Húsalánsgrunnurin,
2 for Sparekasserne.
*Stk. 2.* Udvalgets funktionsperiode er lig med lagtingets valgperiode.

§ 4. Udvalget udfærdiger reglement for fonden, hvilket skal godtages af landsstyret og lagtingets finansudvalg.

§ 5. Henda lög kemur í gildi beinan vegin.

§ 5. Denne lov træder i kraft straks.

**Útreiðslur:**
**Udgifter:**
Landskassans útreiðslur í fíggjarárinum 1984/85 ætlast sum tilskilað í §§ 10-26.
I finansåret 1984/85 anslås landskassens udgifter som anført i §§ 10-26.

| | | Roknskapur 1982/83 kr. (1.000) | Játtan 1983/84 kr. (1.000) | Uppskot landsstýrisins 1984/85 kr. (1.000) | Uppskot Framburðs- og fiskivinnufloksins 1984/85 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|
| **§ 10** Løgtingið: | | | | | |
| Lagtinget: | | | | | |
| 10018 | Løgtingsmenn ..... Lagtingets medlemmer | 5.896 | 5.979 | 6.436 | 6.340 |
| 10106 | Løgting ..... Lagtingsbygning | 379 | 510 | 805 | 407 |
| 10208 | Løgtingstíðindi, kunngerðasavn ..... Lagtingstidende, kundgørelsessamling | 457 | 520 | 588 | 391 |
| 10301 | Grannskoðan (extern) ..... Revision (extern) | 44 | 75 | 75 | 47 |
| 10403 | Grannskoðan (intern) ..... Revision (intern) | 1.098 | 1.117 | 1.317 | 1.180 |
| 10505 | Landsskattanevnd ..... Landsskatteudvalg | 96 | 102 | 99 | 99 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 10607 | Norrønt Ráð<br>Nordisk Råd | 131 | 60 | 100 | 100 |
| 10709 | Norrønt samstarv<br>Nordisk samarbejde | 7 | 90 | 100 | 10 |
| | | 8.108 | 8.453 | 9.521 | 8.674 |
| § 11 | Landsfyrisitingin:<br>Landsadministrationen: | | | | |
| 11015 | Løgmaður og landsstýri<br>Lagmand og landsstyre | 1.449 | 1.481 | 1.510 | 1.510 |
| 11053 | Landsskrivstova<br>Landskontor | 5.620 | 6.169 | 6.964 | 6.042 |
| 11103 | Fiskivinnustova<br>Fiskerikontor | 707 | 700 | 767 | 767 |
| 11155 | Uttanríkistænasta í Aberdeen<br>Udenrigstjeneste i Aberdeen | 427 | 418 | 462 | 462 |
| 11205 | Uttanríkistænasta í København<br>Udenrigstjeneste i København | 608 | 557 | 597 | 597 |
| 11257 | Líkningarráð<br>Ligningsråd | 3.480 | 4.344 | 5.457 | 3.741 |
| 11262 | Samtíðarskattaskipan<br>Kildeskatteordning | — | 7.393 | 5.000 | 0 |
| 11276 | Dataeftirlit<br>Datakontrol | — | 175 | 200 | 179 |
| 11307 | Manntalsstova<br>Folkeregister | 921 | 749 | 806 | 806 |
| 11359 | Almannastova<br>Socialforvaltning | 3.678 | 4.650 | 5.660 | 3.954 |

| | | Roknskapur 1982/83 kr. (1.000) | Játtan 1983/84 kr. (1.000) | Uppskot landsstýrisins 1984/85 kr. (1.000) | Uppskot Framburðs- og fiskivinnufloksins 1984/85 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|
| 11409 | Landsskúlafyrisitingin ..... Landsskoleadministrationen | 4.915 | 6.998 | 7.997 | 5.284 |
| 11452 | Føroya Gjaldstova ..... Færøernes oppebørselskontor | 15.130 | 15.039 | 18.382 | 16.265 |
| 11466 | Gjaldstovudeild í Klaksvík ..... Oppebørselsfilial i Klaksvík | 654 | 663 | 694 | 694 |
| 11471 | Gjaldstovudeild í Saltangará ..... Oppebørselsfilial i Saltangará | 470 | 530 | 614 | 614 |
| 11485 | Gjaldstovudeild í Fuglafirði ..... Oppebørselsfilial i Fuglafirði | 385 | 413 | 411 | 411 |
| 11499 | Gjaldstovudeild á Tvøroyri ..... Oppebørselsfilial i Tvøroyri | 457 | 488 | 548 | 548 |
| 11502 | Gjaldstovudeild í Vági ..... Oppebørselsfilial i Vági | 369 | 387 | 407 | 407 |
| 11516 | Gjaldstovudeild í Sørvági ..... Oppebørselsfilial i Sørvági | 315 | 375 | 370 | 370 |
| 11549 | Endurgjald til sýslurnar fyri skrivstovuhald ..... Kontorholdsgodtgørelse til syslerne | 51 | 40 | 40 | 40 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 11554 | Tolleftirlit ..... | 2.557 | 2.937 | 3.056 | 2.749 |
| | Toldvæsen | | | | |
| 11568 | Trygdareftirlit ..... | 141 | 400 | 329 | 329 |
| | Sikkerhedstilsyn | | | | |
| 11604 | Valuta- og prísráð ..... | 677 | 887 | 906 | 728 |
| | Valuta- og prisråd | | | | |
| 11656 | Lønarráð ..... | 4 | 6 | 6 | 6 |
| | Lønningsråd | | | | |
| 11661 | Heilsu- og heimasjúkra-systraumsitingin ..... | 295 | 317 | 377 | 377 |
| | Administration af sundheds- og hjemmesygeplejeordningen | | | | |
| 11706 | Búskaparráð ..... | 1.596 | 1.987 | 2.164 | 1.716 |
| | Økonomisk råd | | | | |
| 11758 | Ferða- og dagpeningur ..... innan- og uttanlands | 2.380 | 2.200 | 2.500 | 1.000 |
| | Rejse- og dagpenge inden- og udenlands | | | | |
| 11808 | Innheintingarútreiðslur ..... | 45 | 80 | 80 | 48 |
| | Udgifter ved inkasso | | | | |
| 11851 | Ognin Tinganes ..... | 1.184 | 1.713 | 1.931 | 1.273 |
| | Ejendommen Tinganes | | | | |
| 11901 | Landsverkfrøðingsskrivstova .... | 6.395 | 8.079 | 8.910 | 6.875 |
| | Landsingeniørens kontor | | | | |
| 11953 | Umsitingarhús í grunn ..... | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 2.000 |
| | Administrationsbygning i fond | | | | |
| | | 55.910 | 71.175 | 78.095 | 59.792 |

| | | | Roknskapur 1982/83 kr. (1.000) | Játtan 1983/84 kr. (1.000) | Uppskot landsstýrisins 1984/85 kr. (1.000) | Uppskot Framburðs- og fiskivinnuloksins 1984/85 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|---|
| § 12. | | Heilsumál:<br>Sundhedsvæsen: | | | | |
| | 12109 | Landssjúkrahúsið (D.A.H.) .....<br>Landssygehuset (D.A.H.) | 52.247 | 57.151 | 69.814 | 56.166 |
| | 12202 | Klaksvíkar sjúkrahús .....<br>Klaksvík sygehus | 13.277 | 14.363 | 17.067 | 14.273 |
| | 12304 | Suðuroyar sjúkrahús .....<br>Suderø Sygehus | 6.339 | 6.926 | 8.106 | 6.814 |
| | 12406 | Heilsumiðstøðir í grunn .....<br>Sundhedscentre, henlagt i fonds | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| | 12508 | Læknar .....<br>Læger | 457 | 516 | 552 | 491 |
| | 12653 | Heilsu- og heimasjúkrasystraskipan .....<br>Sundheds- og hjemmesygeplejeordning | 1.427 | 2.760 | 3.600 | 3.600 |
| | 12672 | Skúlalæknaskipan .....<br>Skolelægeordning | 35 | 267 | 183 | 183 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 12907 | Ymiskar útreiðslur:<br>Diverse udgifter: | | | | |
| | 303011 Farsóttir ..... | 28 | 45 | 45 | 45 |
| | Epidemiske sygdomme | | | | |
| | 303044 Hvíldarheim. »Naina« ... | 350 | 500 | 600 | 600 |
| | Hvilehjemmet »Naina« | | | | |
| | 303052 Blákrossstovan ..... | — | 300 | 300 | 300 |
| | Blákrossstovan | | | | |
| | 303077 Vaksinatiónir ..... | — | — | 110 | 110 |
| | Vaccinationer | | | | |
| | 303107 Upplýsing um gitnaðar-fyribyrging ..... | — | — | 100 | 100 |
| | Oplysning om svanger-skabsforebyggelse | | | | |
| | 373305 Landsstýrinum at ráða yvir ..... | — | — | 100 | 100 |
| | Landsstyret at råde over | | | | |
| | | 75.160 | 83.828 | 101.577 | 83.782 |

| | | Roknskapur 1982/83 kr. (1.000) | Játtan 1983/84 kr. (1.000) | Uppskot landsstýrisins 1984/85 kr. (1.000) | Uppskot Framburðs- og fiskivinnufloksins 1984/85 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|
| § 13. | Samferðslumál:<br>Kommunikationsvæsen: | | | | |
| 1 | Nýggir vegir og brýr, breiðkan av brúm og umsiting av vegum .....<br>Nye veje og broer, udvidelse af broer og vedligeholdelse af veje | 51.167 | 60.500 | 127.200 | 55.000 |
| 2 | Havnagerð, í grunn .....<br>Havnebygning, henlægges i fond | 40.000 | 48.800 | 45.000 | 45.000 |
| 3 | Lendingar, í grunn .....<br>Landingspladser, henlægges i fond | 24.700 | 23.000 | 18.000 | 18.000 |
| 4 | Flogferðsla, í grunn .....<br>Flyvetrafik, henlagt i fond | 2.500 | 3.500 | 6.000 | 2.500 |
| 6 | Berghols- og brúgvagerð í grunn .<br>Tunnel- og brobygning, henlagt i fond | 6.000 | 14.000 | 8.000 | 6.450 |
| 7 | Studningur til kommunur til asfaltering, í grunn (viðm.) .....<br>Tilskud til kommuner til asfaltering, henl. i fond (anm.) | 6.500 | 6.500 | 6.500 | 9.000 |
| 8 | Byggi- og rakstrargrunnur Postverksins .....<br>Postvæsenets bygge- og driftsfond | 5.900 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 9 | Sekunder berghol í grunn ..... | 5.000 | 4.000 | 5.000 | 5.000 |
| | Sekundære tunneller henl. i fond | | | | |
| 10 | Eykastudningur til 6-ára havnaætlan 1978-84 ..... | — | 8.000 | — | — |
| | Ekstratilskud til 6-års havneplan 1978-84 | | | | |
| | | 141.767 | 171.300 | 218.700 | 143.950 |

**Viðmerkingar til § 13.7**

Kommunurnar eiga kr. 200,- pr . íbúgva pr. ár í mun til fólkatalið við seinastu fólkateljing.

**Anmærkninger til § 13.7**

Kommunerne tildeles kr. 200,- pr. beboer pr. år i forhold til befolkningstallet ved den seneste folketælling.



**§ 14.** Skúlamál:

Undervisningsvæsen:

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 14053 | Felagsútreiðslur fyri skúlaverkið ..... | 166 | 338 | 422 | 178 |
| | Fællesudgifter for skolevæsenet | | | | |
| 14067 | Endurgjald til rithøvundar ..... | — | — | 154 | 0 |
| | Refusion til forfattere | | | | |
| 14103 | Fólkaskúlin ..... | 43.149 | 45.241 | 46.222 | 46.222 |
| | Folkeskolen | | | | |
| 14155 | HF-skeið í Suðuroy ..... | 2.595 | 2.665 | 2.781 | 2.781 |
| | HF-kursus på Suðuroy | | | | |
| 14169 | HF-skeið í Klaksvík ..... | 6.167 | 10.452 | 3.068 | 3.068 |
| | HF-kursus i Klaksvík | | | | |

| | | Roknskapur 1982/83 kr. (1.000) | Játtan 1983/84 kr. (1.000) | Uppskot landsstýrisins 1984/85 kr. (1.000) | Uppskot Framburðs- og fiskivinnuloksins 1984/85 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|
| 14174 | Eysturoyar studentaskúli og HF-skeið ..... Eysturoyar stedenterskole og HF-kursus | — | — | 10.158 | 10.158 |
| 14205 | Studentaskúli og HF-skeið í Hoydølum ..... Gymnasium og HF-kursus i Hoydølum | 13.613 | 15.951 | 17.399 | 14.635 |
| 14257 | Kostdeild Studentaskúlans ..... Studenterskolens kostafdeling | 1.600 | 2.152 | 2.268 | 0 |
| 14307 | Føroya Sjómansskúli ..... Færøernes Navigationsskole | 4.212 | 4.300 | 4.508 | 4.508 |
| 14409 | Klaksvíkar sjómansskúli ..... Klaksvík Navigationsskole | 1.064 | 1.300 | 1.433 | 1.144 |
| 14502 | Føroya Fólkaháskúli (viðm.) .... Færøernes Folkehøjsk. (anm.) | 1.412 | 1.762 | 1.912 | 1.578 |
| 14554 | Húsarhaldsskúlar ..... Husholdningsskoler | 527 | 430 | 486 | 486 |
| 14604 | Kvøldskúlar ..... Aftenskoler | 1.040 | 1.563 | 1.692 | 1.118 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 14656 | Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð ..... Landscentral for undervisningsmateriale | — | — | 1.199 | — |
| 14901 | Ítrótt: | | | | |
| | Idræt: | | | | |
| | 313103 Lánsgr. til ítróttaranlegg .. Lånefond til idrætsanlæg | 100 | 100 | 100 | 100 |
| | 313128 Studn. til Í.S.F. (viðm.) .. Tilskud til Í.S.F. (anm.) | 1.000 | 1.250 | 1.300 | 1.300 |
| | 313136 Studn. til ferðir innanoyggja ..... Tilskud til indenlands rejser | 1.011 | 500 | 550 | 550 |
| 14953 | Ymiskir studningar: | | | | |
| | Diverse tilskud: | | | | |
| | 313152 Grunnur til lærd. lestur ... Studiefond | 450 | 880 | 880 | 500 |
| | 313177 Gr. til annan lestur ..... Fond til anden læsning | 150 | 175 | 175 | 175 |
| | 313215 Lærlingar ..... Lærlinge | 200 | 200 | 200 | 200 |
| | 313223 Landbúnaðarnæmingar .. Landbrugselever | 30 | 40 | 40 | 40 |
| | 313256 Ymisk framhaldsundirv. .. Diverse fortsættelsesundervisning | 10 | 15 | 15 | 15 |

| | | Roknskapur 1982/83 kr. (1.000) | Játtan 1983/84 kr. (1.000) | Uppskot landsstýrisins 1984/85 kr. (1.000) | Uppskot Framburðs- og fiskivinnufloksins 1984/85 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|
| 313264 | Skúlabarnaferðir uttanl. . .<br>Skolebørns rejser udenl. | 54 | 60 | 60 | 60 |
| 313272 | Skúlabarnaferðir innanoyggja .....<br>Skolebørns rejser indenlands | 361 | 450 | 450 | 388 |
| 313302 | Ítróttar- og skúlabyggigr. .....<br>Idræts- og skolebyggefond | 5.000 | 5.000 | 18.000 | 5.500 |
| 313319 | Sjómansskúli í grunn .....<br>Navigationsskole i fond | — | 500 | 500 | 0 |
| 313335 | Studentaskúli í Hoydølum í grunn .....<br>Gymnasium i Hoyd. henlægges i fond | — | — | 500 | 0 |
| 313351 | Næmingastudningur til listamenn .....<br>Tilskud til kunstneres uddannelse | 45 | 35 | 35 | 35 |
| 313368 | Føroya skúlasavn .....<br>Færøernes skolesamling | 70 | 70 | 0 | 100 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 313376 | Meginfelag føroysku Studenta og Meginfelag føroyinga undir útbúgving | 50 | 85 | 90 | 55 |
| 313384 | Norrøna Felagið ..... Norrøna Felagið | 25 | 25 | 30 | 30 |
| 313406 | Studn. til fremmand, ið lesa í Føroyum ..... Tilskud til ikke-færinger, der studerer på Færøerne | 20 | 25 | 25 | 25 |
| 313422 | Landsskúlafyrisitingini at ráða yvir ..... Landsskoleadministrationen at råde over | 11 | 26 | 30 | 15 |
| 313439 | Landsskúlafyrisitingini at ráða yvir: Eftirútbúgving av handverkarum ..... Landsadministrationen at råde over: Efteruddanelse af håndværkere | — | 200 | 300 | 215 |
| 313455 | Ungmannafeløgini ULF og UF ..... Ungdomsforeningerne ULF og UF | — | — | 200 | 0 |
| 373305 | Landsstýrinum at ráða yvir ..... Landsstyret at råde over | 150 | 200 | 200 | 200 |
| | | 84.282 | 95.990 | 118.032 | 87.691 |

**Viðmerkingar**
**til § 14-14502**

Herav kr. 60.000,- árliga í 10 ár studningur til rindan av lánum. Hetta er 7. gjald.

**til § 14.14901/313128**

Herav kr. 50.000,- at býta til boltfeløgini til venjarar.

**Anmærkninger**
**til § 14-14502**

Heraf kr. 60.000 pr. år til tilskud til betaling af lån. Dette er 7. rate.

**til § 14.14901/313128**

Heraf kr. 50.000,- at fordele imellem boldklubberne til trænere.

| | | Roknskapur 1982/83 kr. (1.000) | Játtan 1983/84 kr. (1.000) | Uppskot landsstýrisins 1984/85 kr. (1.000) | Uppskot Framburðs- og fiskivinnufloksins 1984/85 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|
| **§ 15.** | Vísindi, bókmentir og list:<br>Videnskab, litteratur og kunst: | | | | |
| 15109 | Landsbókasavn .....<br>Landsbibliotek | 2.177 | 2.492 | 2.633 | 2.340 |
| 15202 | Fólkabókasøvn .....<br>Folkebiblioteker | 2.252 | 3.332 | 3.614 | 3.421 |
| 15304 | Landsskjalasavn .....<br>Landsarkiv | 729 | 988 | 1.366 | 783 |
| 15406 | Føroya Fornminnissavn .....<br>Færøernes museum | 2.657 | 3.088 | 3.417 | 2.856 |
| 15508 | Bygdasøvn (viðm.) .....<br>Bygdemuseer (anm.) | 142 | 198 | 485 | 303 |
| 15551 | Fiskirannsóknarstova .....<br>Fiskeribiologisk laborator. | 6.378 | 8.547 | 10.361 | 6.856 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 15653 | Fuglakanningarstøð v.m. ..... | 33 | 20 | 25 | 25 |
| | Ornitologisk station m.v. | | | | |
| 15703 | Náttúrugripasavn ..... | 1.015 | 1.425 | 1.788 | 1.091 |
| | Naturhistorisk samling | | | | |
| 15717 | Danmarks Geol. unders. ..... | 367 | 472 | 430 | 395 |
| | D.G.U. | | | | |
| 15755 | Fróðskaparsetur Føroya ..... | 4.111 | 4.657 | 5.338 | 4.419 |
| | Færøernes Akademi | | | | |
| 15793 | Stovnar á Debesartrøð (felagsútreiðslur) ..... | 950 | 1.147 | 1.188 | 1.021 |
| | Institutioner på Debesartrøð (fællesudgifter) | | | | |
| 15805 | Heilsufrøðilig starvsstova ..... | 1.372 | 1.876 | 2.034 | 1.475 |
| | Hygiejnisk laboratorium | | | | |
| 15857 | Náttúrufriðingarnevndir ..... | 230 | 100 | 200 | 250 |
| | Naturfredningsudvalg | | | | |
| 15897 | Tónleikur og sangur (viðm.) ..... | 551 | 675 | 750 | 600 |
| | Musik og sang (anm.) | | | | |
| 15907 | Ymiskir studningar: | | | | |
| | Diverse tilskud: | | | | |
| | 323012 Barnabløð ..... | 5 | 30 | 35 | 35 |
| | Børneblade | | | | |
| | 323037 Sjónleikur ..... | 200 | 250 | 300 | 300 |
| | Teater | | | | |
| | 323053 Til útgávu av barnabókum | 500 | 450 | 500 | 500 |
| | Til udgivelse af børnebøger | | | | |

| | | Roknskapur 1982/83 kr. (1.000) | Játtan 1983/84 kr. (1.000) | Uppskot landsstýrisins 1984/85 kr. (1.000) | Uppskot Framburðs- og fiskivinnufloksins 1984/85 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|
| 323086 | Sømdarpeningur til skald og listamenn (viðm.) ..... | 51 | 85 | 102 | 0 |
| | Hædersgaver til digtere og kunstnere (anm.) | | | | |
| 323108 | Lán og studn.gr. til bókaútgávu ..... | 100 | 100 | 100 | 100 |
| | Låne- og tilskudsf. til udg. af bøger | | | | |
| 323116 | Skúlabókaútgáva ..... | 700 | 900 | 1.000 | 753 |
| | Udg. af skolebøger | | | | |
| 323124 | Norðurlandahús, í grunn . | 4.500 | 2.533 | 1.365 | 0 |
| | Nordisk hus, henl. i fond | | | | |
| 323132 | Sjónleikarhús, í grunn .... | 75 | 75 | 100 | 80 |
| | Teater | | | | |
| 323149 | Fornminnissavn í grunn .. | 200 | 200 | 200 | 200 |
| | Museum, henl. i fond | | | | |
| 323157 | Útvarðssendistøðir í grunn | — | 2.500 | 2.500 | 2.500 |
| | Radiosender, henl. i fond | | | | |
| 323165 | Rakstur av Bókamiðsøluni | 220 | 250 | 275 | 237 |
| | Drift af Bókamiðsølan | | | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 323173 | Orðabókaútgáva í grunn .. Udgivelse af bøger, henl. i fond | 75 | 96 | 100 | 80 |
| 323181 | Ungdóms- og bygdahús í grunn ..... Ungdoms- og bygdehus henl. i fond | — | 500 | 500 | 500 |
| 323228 | Mentunargrunnurin (MFL) Kulturfonden (MFL) | 200 | 200 | 350 | 215 |
| 323236 | Føroya Listasavn v.m..... Færøernes kunstsamling m.v. | 1.118 | 200 | 275 | 200 |
| 323244 | Savn í Hoyvík, í grunn ... Museum i Hoyvík, henl. i fond | 500 | 500 | 100 | 100 |
| 323269 | Føroyskt-íslendskt mentunarligt samstarv..... Færøsk-islandsk kulturelt samarbejde | — | — | 50 | 0 |
| 373305 | Landsstýrinum at ráða yvir ..... Landsst. at råde over | 101 | 150 | 300 | 115 |
| | | 31.508 | 38.036 | 43.781 | 30.678 |

**Viðmerking**
**til § 15.15508**

Harav kr. 150.000 til keyp av prestagarðinum á Nesi.

Heraf kr. 150.000 til køb af præstegården på Nes.

| | | Roknskapur 1982/83 kr. (1.000) | Játtan 1983/84 kr. (1.000) | Uppskot landsstýrisins 1984/85 kr. (1.000) | Uppskot Framburðs- og fiskivinnufloksins 1984/85 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|
| **§ 16.** | Fiskivinna, sigling o.t.: | | | | |
| | Fiskeri, søfart o.l.: | | | | |
| 16018 | Vrakarastovnur ..... | 1.715 | 1.820 | 2.040 | 8.000 |
| | Vragerinstitution | | | | |
| 16106 | Nautiskt royndarkamar ..... | 32 | 17 | 17 | 17 |
| | Nautisk prøvekammer | | | | |
| 16208 | Sjómansheim (viðm.) ..... | 141 | 140 | 140 | 140 |
| | Sømandshjem (anm.) | | | | |
| 16301 | Vaktar- og bjargingar-tænasta (viðm.) ..... | 12.545 | 14.268 | 15.938 | 13.636 |
| | Vagt- og bjergningstjeneste (anm.) | | | | |
| 16403 | Laksa- og sílaaling ..... | 560 | 1.000 | 1000 | 1.000 |
| | Lakse- og ørreddrift | | | | |
| 16505 | Prísásetingarnevndin fyri fisk .... | 110 | 100 | 100 | 100 |
| | Udvalg til fastsættelse af fiskepriser | | | | |
| 16607 | Fiskivinnuráð ..... | 167 | 223 | 244 | 100 |
| | Fiskeriråd | | | | |
| 16904 | Aðrir studningar: | | | | |
| | Andre tilskud: | | | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 333011 | Kanning av dálking í samband við laksa- og sílaaling ..... | — | 400 | 400 | 400 |
| | Undersøgelser af forurening i forb. med lakse- og ørreddrift | | | | |
| 333017 | Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna ..... | 230.521 | 203.000 | 203.000 | 248.000 |
| | Mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet | | | | |
| 333025 | Studn. til grunnin til endurn. av fiski- og farmaskipaflotanum .... | 12.000 | 25.000 | 25.000 | 25.000 |
| | Tilskud til fonden til fornyelse af fiske- og fragtskibe | | | | |
| 333033 | Grindir ..... | 47 | 10 | 50 | 50 |
| | Grindefangst | | | | |
| 333074 | Prakt. fiskiroyndir í grunn (viðm.) | 4.998 | 5.500 | 5.500 | 5.500 |
| | Praktiske fiskeriforsøg i fond (anm.) | | | | |
| 333082 | Vaktarskip, í grunn ..... | 100 | 300 | 300 | 300 |
| | Vagtskib, henl. i fond | | | | |
| 333099 | Útrórarstøðir, í grunn ..... | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| | Hjemmefiskeristationer, henl. i fond | | | | |
| 333104 | Trygdargrunnur veiðumanna .... | 355 | 200 | 200 | 400 |
| | Fiskernes garantifond | | | | |
| 373305 | Landsstýrinum at ráða yvir ..... | 166 | 200 | 250 | 180 |
| | Landsstyret at råde over | | | | |
| | | 264.457 | 253.178 | 291.726 | 303.823 |

| Viðmerkingar | Anmærkininger |
|---|---|
| **til § 16.301** | |
| Íroknað 150.000 kr. til kost v.m. hjá sjómansskúlanæmingum í praktikk. | Inclusivt 150.000 kr. til kost m.m. til sømandsskoleelever i praktik. |
| **til 16.904/333074** | |
| Praktiskar fiskiroyndir verða gjørdar í samráð við løgtingsins fiskivinnunevnd. | Praktiske fiskeriforsøg udføres i samråd med lagtingets fiskeriudvalg. |

| | | Roknskapur 1982/83 kr. (1.000) | Játtan 1983/84 kr. (1.000) | Uppskot landsstýrisins 1984/85 kr. (1.000) | Uppskot Framburðs- og fiskivinnufloksins 1984/85 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|
| **§ 17.** | Landbúnaður og matrikulering:<br>Landbrug og matrikulering: | | | | |
| 17015 | Landsdjóralæknaembætið .....<br>Landsdyrelægeembedet | 562 | 591 | 656 | 604 |
| 17048 | Landbúnaðarráðgevari .....<br>Landbrugskonsulent | 246 | 273 | 295 | 264 |
| 17053 | Seyðaráðgevari og seyðaroyndir ..<br>Fåreavlskonsulent og fåreavlsforsøg | 119 | 135 | 138 | 128 |
| 17103 | Útskifting og matrikulstova .....<br>Udskiftning og matrikelkontor | 4.112 | 4.494 | 5.130 | 4.420 |
| 17205 | Royndarstøð .....<br>Forsøgstation | 1.518 | 6.670 | 6.890 | 1.632 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 17901 | Aðrir studningar:<br>Andre tilskud: | | | | |
| 343013 | Húsdjóraaling<br>Husdyreopdrætning | 225 | 230 | 275 | 242 |
| 343021 | Nýdyrking v.m.<br>Nyopdyrkning m.v. | 1.500 | 1.800 | 1.800 | 1.613 |
| 343038 | Rentustudningur til landbúnaðarlán<br>Rentetilskud til landbrugsl. | 1.800 | 2.000 | 2.200 | 1.935 |
| 343046 | Studningur til ílegging í landbúnaðin (viðm.)<br>Financieringstilskud til landbruget (anm.) | 3.500 | 3.800 | 4.000 | 3.763 |
| 343054 | Studningur til mjólkarframleiðslu<br>Tilskud til mælkeproduktionen | 5.850 | 6.486 | 7.724 | 6.289 |
| 343062 | Studningur til súrhoyggjbrunnar<br>Tilskud til græssiloer | 875 | 950 | 950 | 941 |
| 343079 | Træplanting<br>Plantning af træer | 700 | 700 | 800 | 753 |
| 343087 | Skeiðvirksemi<br>Kursusvirksomhed | 51 | 85 | 95 | 55 |
| 343117 | Vakstrarhús í grunn<br>Drivhuse i fond | — | — | 1.000 | 0 |
| 344125 | Studn. til stráfóður<br>Tilskud til stråfoder | — | — | 800 | |
| 373305 | Landsst. at ráða yvir<br>Landst. at råde over | 73 | 100 | 100 | 78 |
| | | 21.131 | 28.314 | 32.853 | 22.717 |

| Viðmerkingar | Anmærkninger |
|---|---|
| **til § 17.17901/343046** | |
| Játtanin verður tó ikki at nýta til sethúsabygging. | Bevillingen må dog ikke anvendes til opførelse af beboelseshus. |
| **til § 17.17901/344125** | |
| Studningurin umfatar eisini í minsta lagi 4 kvigu- og ella tarvaviðsetingar. | Støtten omfatter også minst opdræt af 4 kvier og/eller tyre. |

| | | Roknskapur 1982/83 kr. (1.000) | Játtan 1983/84 kr. (1.000) | Uppskot landsstýrisins 1984/85 kr. (1.000) | Uppskot Fram-burðs- og fiskivinnu-floksins 1984/85 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|
| **§ 18.** | Handil, ídnaður o.t.: Handel, industri m.v. | | | | |
| 18109 | Arbeiðseftirlit ..... Arbejdstilsyn | 1.072 | 1.299 | 1.583 | 1.152 |
| 18152 | Brandvenjingarstøðin við Áir .... Brandtræningsstationen | 420 | 126 | 194 | 0 |
| 18202 | Bileftirlit ..... Biltilsyn | 1.015 | 1.960 | 2.015 | 2.015 |
| 18216 | Radioeftirlit ..... Radiotilsyn | 200 | 275 | 400 | 400 |
| 18235 | Ráðið fyri ferðslutrygd ..... Rådet for færdselssikkerhed | 250 | 250 | 275 | 275 |
| 18268 | Filmseftirlitið ..... Filmstilsynet | 140 | 152 | 167 | 167 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 18304 | Skipaskrá og uppmáling ..... | 86 | 25 | 35 | 35 |
| | Skibsregistrering og opmåling | | | | |
| 18318 | Semingsmannaskipan ..... | 40 | 58 | 41 | 72 |
| | Forligsinstitution | | | | |
| 18323 | Kolagrevstur ..... | 829 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| | Kulbrydning | | | | |
| 18337 | Læruráðið ..... | 155 | 306 | 340 | 167 |
| | Lærerådet | | | | |
| 18342 | Skeiðvirksemi ..... | 99 | 120 | 135 | 106 |
| | Kursusvirksomhed | | | | |
| 18907 | Aðrir studningar: | | | | |
| | Diverse tilskud: | | | | |
| 353018 | Føroya Ferðamannafelag ..... | 200 | 200 | 500 | 500 |
| | Færøernes Turistforening | | | | |
| 353026 | Stuðul til ídnaðarfremjandi endam. (viðm.) ..... | 4.110 | 4.000 | 5.000 | 5.000 |
| | Støtte til industrifremmende form. (anm.) | | | | |
| 353034 | At leggja í gistingarhúsgrunnin ... | 600 | 600 | 600 | 1.000 |
| | Henl. til hotelfonden | | | | |
| 353042 | Til menningargrunn ..... | 8.000 | 9.000 | 9.000 | 9.000 |
| | Til udviklingsfond | | | | |
| 353067 | Studningur til meistarar ..... | 2.028 | 2.000 | 2.000 | 2.180 |
| | Tilskud til mestre | | | | |
| 353083 | Til orkugrunn ..... | 9.000 | 4.500 | 5.000 | 0 |
| | Til energifond | | | | |
| 373305 | Landsst. at ráða yvir ..... | 217 | 275 | 300 | 233 |
| | Landst. at råde over | | | | |
| | | 28.461 | 26.146 | 33.266 | 23.302 |

**Viðmerkingar:**

**Til § 18-18907/353026**

Verður saman við avlopi 1982/83 umlagt til grunn, sum landsstýrið saman við fíggjarnevndini ráða yvir

**Anmærkninger:**

Omlægges tilligemed restbevilling 1982/83 til fond, som landsstyret sammen med finansudvalget råder over.

| | | Roknskapur 1982/83 kr. (1.000) | Játtan 1983/84 kr. (1.000) | Uppskot landsstýrisins 1984/85 kr. (1.000) | Uppskot Framburðs- og fiskivinnufloksins 1984/85 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|
| **§ 19.** | Almannamál v.m.: | | | | |
| | Socialvæsen m.v.: | | | | |
| 19056 | Fólkapensjón ..... | 67.900 | 79.245 | 91.440 | 72.993 |
| | Folkepension | | | | |
| 19106 | Avlamispensjón ..... | 25.118 | 28.010 | 31.170 | 27.002 |
| | Invalidepension | | | | |
| 19208 | Barnastyrkur til stakar uppihaldarar ..... | 1.349 | 1.280 | 1.845 | 1.450 |
| | Børnebidrag til enlige forsørgere | | | | |
| 19301 | Einkjupensjón ..... | 2.281 | 2.530 | 1.075 | 2.452 |
| | Enkepension | | | | |
| 19403 | Vanlig forsorg | 7.708 | 10.820 | 12.183 | 8.286 |
| | Almindelig forsorg | | | | |
| 19519 | Uppiskoytisveiting ..... | — | — | 1.015 | 1.015 |
| | Tillægsydelse | | | | |
| 19557 | Barnaforsorg ..... | 3.683 | 3.915 | 4.385 | 3.959 |
| | Børneforsorg | | | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 19607 | Heimahjálparskipanin ..... | 14.145 | 15.153 | 16.250 | 15.206 |
| | Hjemmehjælpsordningen | | | | |
| 19659 | Dagpeningaskipan ..... | 10.558 | 11.695 | 13.995 | 11.350 |
| | Dagpengeordning | | | | |
| 19664 | Bjálving av húsum hjá pensjónistum ..... | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| | Isolering af pensionistboliger | | | | |
| 19752 | Brennistuðn. til pensjónistar ..... | 3.671 | 3.700 | 3.700 | 3.700 |
| | Brændselstilskud til pensionister | | | | |
| 19904 | Ymsir studningar: | | | | |
| | Forskellige tilskud: | | | | |
| 36303 | Styrkveiting ..... | 156 | 150 | 150 | 150 |
| | Understøttelse | | | | |
| 363611 | Ellisheim ..... | 894 | 1.200 | 2.100 | 2.100 |
| | Alderdomshjem | | | | |
| 363628 | Endurútbúgving (herundir ALV) | 360 | 600 | 600 | 600 |
| | Revalidering (herunder ALV) | | | | |
| 363536 | Frähaldsfeløg ..... | 295 | 350 | 400 | 350 |
| | Afholdsforeninger | | | | |
| 363644 | »Reyði Krossur« ..... | 0 | 10 | 10 | 10 |
| | »Reyði Krossur« | | | | |
| 363652 | Hjálpargrunnur fyri óarbeiðsførar fiskimenn ..... | 125 | 150 | 150 | 150 |
| | Fonden for uarbejdsdygtige fiskere | | | | |
| 363669 | Meginfelag teirra brekaðu ..... | — | 150 | 250 | 250 |
| | Meginfelag teirra brekaðu | | | | |
| 363685 | Húsalánsgrunn ..... | 10.000 | 10.000 | 12.000 | 10.000 |
| | Huslånefond | | | | |

| | | Rokaskapur 1982/83 kr. (1.000) | Játtan 1983/84 kr. (1.000) | Uppskot landsstýrisins 1984/85 kr. (1.000) | Uppskot Framburðs- og fiskivinnuflokksins 1984/85 kr. (1.000) |
|---|---|---|---|---|---|
| 363693 | Kommunalur lánsgrunnur ..... Kommunal lånefond | 1.000 | 1.000 | 2.000 | 2.000 |
| 363707 | Arbeiðsloysisgrunnur arbeiðarafelaga ..... Arbejderforeningers arbejdsløshedsfonds | 75 | 400 | 400 | 400 |
| 363715 | Føroyahús í København, í grunn . Føroyahús i København, henlagt i fond | 275 | 232 | 250 | 250 |
| 363731 | Ansingar- og røktarheim, í grunn Opholds- og plejehjem, henlagt i fond | 1.000 | 11.000 | 11.000 | 11.000 |
| 363748 | Íbúðagrunnur ..... Boligfond | 1.500 | 1.500 | 1.500 | 1.500 |
| 363756 | Rentustudningur til húsabygging Rentetilskud til beboelseshuse | 28 | 25 | 25 | 25 |
| 363777 | Næmingaheim í grunn ..... Elevboliger henl. i fond | — | 500 | 500 | 500 |
| 373305 | Landsstýrinum at ráða yvir ..... Til landsstyret at råde over | 370 | 300 | 330 | 330 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 19918 | Skúlin á Trøðni ..... Skolen á Trøðni | 2.109 | 2.430 | 2.651 | 2.651 |
| | | 157.600 | 189.345 | 214.374 | 182.679 |
| **§ 27.** | Ymisk endamál: | | | | |
| | a. Likviditetshjálpargrunnur | — | — | — | 15.000 |
| | b. Húsalánshjálpargrunnur | — | — | — | 15.000 |
| | c. Kappingaruppsparing | — | — | — | 20.000 |
| | d. Óvæntað dýrtíð | — | — | — | 30.000 |
| | e. Landskassans tvungna uppsparing | — | — | — | 103.267 |
| | Samanlagdar útreiðslur Samlede udgifter | 915.670 | 998.229 | 1.172.725 | 1.172.725 |
| | Munur/Balance | 50.329 | 3.343 | 208 | 208 |
| | | 965.999 | 1.001.571 | 1.172.933 | 1.172.933 |

| | | |
|---|---|---|
| **§ 41.** | Lán: | |
| | Nýupptikin lán | 40.000.000 |

2. viðgerð 29. mars 1984.

**Uppskot landstýrisins**

§ 1: Broyting frá meirilutanum í fíggjarnevndini samtykt við 24-0, § 1 soleiðis broytt, samtykt við 27-0.

§ 2: Broyting frá meirilutanum samtykt við 25-0, § 1 soleiðis broytt samtykt við 27-0.

§§ 3-8 samtyktar við 27-0.

§ 10: Broyting frá meirilutanum samtykt við 23-0, § 10 soleiðis broytt samtykt við 27-0.

§ 11: Broyting frá meirilutanum samtykt við 25-0, § 11 soleiðis broytt samtykt við 27-0.

§ 12: Broyting frá meirilutanum samtykt við 25-0, § 12 samtykt við 27-0.

Broytingaruppskot til § 12 frá sosialu nevndini samtykt við 31-0.

§ 13: Broyting frá meirilutanum til pkt. 1 samtykt við 18-4, pkt. 2, 3, 6 og 11 samtykt við 26-0, § 13 soleiðis broytt samtykt við 27-0.

§ 14: Broyting frá meirilutanum til 14053, 14307, 14409 samtykt við 23-0 og § 14-14656 samtykt við 18 ja-atkvøðum og 9 nei-atkvøðum, 5 atkvøddu ikki. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Juul Jacobsen, Arne Ziskasen, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Olaf Olsen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Jacob Lamhauge, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein.

Nei atkvøddu: Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Jacob Lindenskov, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen.

Atkvøddu ikki: Adolf V. Hansen, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Hans M. Joensen.

§ 14-14901: Broytingaruppskot frá meirilutanum samtykt við 30-0, § 14-14953/313152, 149953/313173 samtykt við 30-0. § 14-14953/313368 samtykt við 29-0. § 14 soleiðis broytt samtykt við 27-0.

§ 15: Broyting frá meirilutanum til § 15-508 samtykt við 18-0, og til § 15-323157 samtykt við 30-0. § 15 soleiðis broytt samtykt við 27-0.

§ 16: Broyting frá meirilutanum samtykt við 28-0, § 16 solciðis broytt samtykt við 28-0.
§ 17: samtykt við 20-0.
§ 18: samtykt við 30-0.
Broytingaruppskot frá minnilutanum (Ova Mikkelsen) og meirilutanum í fíggjarnevndini til § 18-353083 samtykt við 30-0.
§ 19: samtykt við 29-0.
§§ 30-46 samtykt við 26-0.

Broyting frá Adolf V. Hansen til §§ 10-15 fall við 2-0. § 16 fall við 2-0, §§ 17-19 fall við 2-0, § 27 A fall við 2-0, B fall við 2-0, C fall við 2-0, D fall við 2-0, E fall við 2-0.
Broytingaruppskot frá Ova Mikkelsen, § 6, fall við 13-0.
Broytingaruppskot frá minnilutanum Ova Mikkelsen, og Atla Dam til 313152 fall við 15 ja-atkvøðum, 17 atkvøddu ikki. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Jacob Lindenskov, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Arne Ziskasen, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Age Ellefsen, Olaf Olsen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Jacob Lamhauge, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein.

Løgtingsmenninir Atli P. Dam, Petur Reinert, Adolf Hansen og Finnbogi Isaksen løgdu fram soljóðandi

**broytingaruppskot**

§ 22: Aðrar og óvissar útreiðslur:
253808 Studningur til politiska upplýsing v.m. 1.040.000 kr.
Tilskud til politisk oplysningsarbejde
§ 2: 2017 Tollgjøld 566.600.000 kr.

Løgtingsmenninir Asbjørm Joensen, Øssur Dam Jacobsen, Svend Áge Ellefsen og Ivan Johannesen løgdu 29. mars fram soljóðandi

**broytingaruppskot**

til § 15-202/373106.

**Sum viðmerking verður sett:**

Viðm.
Rakstrarstudningur verður eisini at galda skúlabókasøvn.

Anm.
Driftstilskud kan også ydes til skolebiblioteker.

Sama dag legði sosiala nevndin fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

Í uppskoti landsstýrisins verður í

| | | Uppskot landsstýrisins 1984/85 kr. (1.000) |
|---|---|---|
| »§ 12 | | |
| 12508 | Læknar ..... | 552 |
| | Læger« | |

hækkað við 160.000 kr. sum løn til amanuensisstarv í Sandoy, og verður soljóðandi:

| | | |
|---|---|---|
| »12508 | Læknar ..... | 712 |
| | Læger« | |

Broytingaruppskot frá minnilutanum (Ova Mikkelsen) til § 15 fall við 13-0, og frá minnilutanum (Atli Dam) til § 16-333017, fall við 15-0, frá Ova Mikkelsen til § 16 fall við 6-0, § 18-18109 fall við 13-0, § 18-35042 fall við 15-0, og frá minnilutanum (Atli Dam) § 18-353083 fall við 7-0.Broytingaruppskot frá minnilutanum (Ova Mikkelsen og Atla Dam) til 363685 fall við 15-0 og frá minnilutanum (Atli Dam

§§ 1-7 fall við 7-0, § 8 fall við 7-0, § 11 fall við 15-0, § 12 fall við 10-0, § 13 fall við 7-0, § 14-313128 fall við 10-0, § 14-14953 fall við 15-0, § 14-313455 fall við 13-0, § 15 fall við 15-0, § 18-353042 fall við 15-0, § 19-363694 fall við 15-0, § 19-363707 fall við 14-0, § 19-363708 fall við 13-0, § 19-363716 fall við 13-0.

Lógaruppskot frá minniluta Adolf V. Hansen I, § 1, fall við 2-0, II, § 1 fall við 2-0, III, § 1 fall við 14-0. IV, § 1 fall við 13-0.

Uppskot til samtyktar frá Atla Dam um tjóðarbankaavlop fall við 15-0, um arbeiðseftirlit fall við 15-0 og um skipabygging fall við 12-0.

Uppskotið solciðis broytt og samtykt, samtykt at fara til 3. viðgerð við 29-0.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Broytingaruppskot frá Asbjørn Joensen, Øssi Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen og Ivan Johannesen varð framlagt. Broyting til § 15-202/373106 samtykt við 21-0. Broyting til § 22-253808 fall við 15-0. Uppskotið soleiðis broytt og sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 400-36. Lóg nr. 25 frá 30. mars 1984.

---

# 36. Forboð móti at brúka føroyska flaggið sum lættisoppaflagg.

Ár 1983, hósdagin 15. december legði Adolf V. Hansen vegna Framburðs- og Fiskivinnuflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Føroya løgting áleggur landsstýrinum beinanvegin at leggja fyri tingið lógaruppskot, sum verjir føroyska flaggið móti missbrúki.

Samstundis verður álagt landsstýrinum at kanna hvørji tey 8 skipini hjá Elite-Shipping, ið sambært Børsen eru skrásett undir føroyskum flaggið, eru og hvør ið hevur givið loyvið til hesa skráseting, og at taka tey stig, ið neyðug eru til tess at reinsa og verja flaggið til omanfyri nevnda lóg er viðtikin og sett í gildi.

**Viðmerkingar:**
Tað er helst ikki bert Prinz Oberon, ið brúkar føroyska flaggið sum lættisoppaflagg, men eisini danska reiðarfirið Elite-Shipping. (Teir sum eru korresponderandi reiðarar fyri skipini hjá Føroysk Saltsøla v/ Hans Paula Johannesen).

Í eini grein í blaðnum Børsen fyri í gjár 14. december 1983 undir heitinum: »Mindre rederier i farezonen med lovforslag fra Lykketoft« verður undir undirheitinum »Dyrt flag« skrivað:

> — En mere interessant udvikling er den øgede anvendelse af Færø-flag, der med rette kan betragtes som dansk »bekvemmelighedsflag«, idet der er flere økonomiske fordele ved at lade skibene sætte under Færø-flag. Eksempelvis er otte ud af elleve skibe disponeret af Elite-Shipping i København under Færø-flag.

Víðari skal vera víst til listan á somu síðu í Børsen yvir donsk reiðarfirir har tað undir teiginum »Virksomhedsform« út fyri Elite-Shipping stendur »Partrederier og I/S 8 skibe under Færø-flag.

Tey tvey skipini hjá Saltsøluni, vita vit eru loyvliga skrásett her á landið, men spurningurin er, hvørji eru hini seks skipini. Vit eiga í hesum døgum at vísa størsta varsemi, og tí hetta uppskot.

1. viðgerð 27. januar. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fyri løgtingið av Adolf Hansen 15. december 1983 og undir 1. viðgerð 27. januar 1984 beint í Marknaðarnevndina.

Ein samd nevnd metir, at løgtingslóg nr. 42 frá 17. juli 1959 um føroyska flaggið verjir føroyska flaggið nóg væl móti misbrúki.

Nevndin hevur kannað, um nakað útlendskt skip er skrásett undir føroyskum flaggi, og er komin til ta niðurstøðu, at so er ikki. Tó eigur Elite-Shipping helvtina í skipinum »Herborg«. Tí kann nevndin ávísa, at einki hald er tí, sum ført er fram í tí fotoavritaða skjalatilfarinum.

Nevndin setir tí einki uppskot fram.

2. viðgerð 7. mai. Uppskot um at beina málið aftur í nevnd fall við, at 27 atkvøddu ímóti. Fyrri parturin av uppskotinum fall við 8-0. Málið sostatt burturdottið.

---

# 37. Loysn á arbeiðsósemjuni um virkan av fiski.

Ár 1983, hósdagin 15. december legði Atli P. Dam, løgtingsmaður vegna Asbjørn Joensen, Adolf Hansen, Hans M. Joensen og seg sjálvan fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt at skipa so fyri, at partarnir í ósemjuni verða kallaðir saman til tess at tryggja at fiskur beinan vegin verður keyptur og arbeiddur, og at samráðingar verða tiknar upp millum partarnar í ósemjuni.

**Viðmerkingar:**
Hóast generellu reglurnar um at partarnir á arbeiðsmarknaðinum sjálvir loysa sínar ósemjur, er verandi støða — har samfelagið alt verður lagt lamið og har bólkar, ið ikki hava ávirkan á eina møguliga

loysn av trætuni verða raktir – so hættislig, at serlig stig mugu takast fyri at fáa eina samráðingarloysn alt fyri eitt.

Ósemjan er so serlig, at tað má metast rímuligt at landsmyndugleikarnir gera alt, ið møguligt er fyri at halda framleiðsluna í gongd.

1. viðgerð 15. december. Málið varð beint í lóganevndina, sum sama dag legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð framlagt av løgtingsmonnunum Atla Dam, Asbjørn Joensen, Adolf V. Hansen, Hans M. Joensen og Svend Aage Ellefsen tann 15. december 1983 og við 1. viðgerð sama dag beint í lóganevndina.

Lóganevndin hevur viðgjørt málið og hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta. Meirilutin (Asbjørn Joensen, Vilhelm Johannesen, Arne Ziskesen, og Petur Reinert) mælir til at samtykkja uppskotið.

Ein minniluti (Agnar Nielsen) førir fram at við teirri ábyrgd eitt hvørt felag hevur yvir fyri samfelagnum metir minnilutin at partarnir eiga at fáa stundir til at loysa ósemjuna uttan almenna uppílegging.

2. viðgerð sama dag. Málið varð samtykt við 21-2 atkvøðum.

---

# 38. Broyting í løgtingslóg um vinnusteðg.

Ár 1984, týsdagin 24. januar legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

## Uppskot til

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinningssteðg.**

**§ 1.** Í løgtingslóg nr. 54 frá 14. september 1981 um vinningssteðg við seinri broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, stk. 1, verða orðini »hvørki í kr. ella %« broytt til: »í %«.
2) Í § 5 verður »31. december 1983« broytt til: »31. december 1984«.

**§ 2.** Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1984.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om avancestop.**

**§ 1.** I lagtingslov nr. 54 af 14. september 1981 om avancestop med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 1, stk. 1, ændres ordene »hverken absolut eller i %« til: »i %«.
2) I § 5 ændres »31. december 1983« til »31. december 1984.«

**§ 2.** Denne lov træder i kraft 1. januar 1984.

**Viðmerkingar:**

Við løgtingslóg nr. 54 frá 14. september 1981 varð vinningssteðgur settur bæði í krónum og procentum.

Lógin hevur verið galdandi í umleið 1/2 ár hvørja ferðina og framlongd við teirri broytingum, at vinningurin í krónum ikki hevur verið galdandi í øllum tíðarskeiðunum, tí mett hevur verið, at tað ikki ber til at avmarka vinningin í krónum í ov long tíðarskeið hvørja ferð.

Síðan lógin kom í gildi er prístalið hækkað úr 130,8 stigum pr. 1. oktober 1981 upp í 145,9 stig pr. 1. januar 1981 og upp í 104,7 stig pr. 1. oktober 1983, t.v.s. at prístalið tey tvey árini, lógin hevur verið í gildi, bert er hækkað við 14% ella 7% árliga í meðal. Sostatt má metast, at lógin hevur havt sína ávirkan á tann lága prístalsvøksturin hesi árini.

Eftir fyriliggjandi uppskoti verður mælt til, at framleingja lógina til 31. december, at hámarksvinningurin bert verður í procentum.

1. viðgerð 27. januar. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 9. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Meirilutin (Ivan Johannesen, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Asbjørn Joensen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Atli P. Dam og Ove Mikkelsen) mælir til »hvørki í % ella kr.«

Minnilutin (Adolf V. Hansen) mælir til at avtaka lógina.

2. viðgerð 9. mai. Broyting frá meirilutanum í fíggjarnevndini til § 1 varð samtykt við 26-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 25-0 atkvøðum.

3. viðgerð 9. mai. Málið endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

F.L.j. nr. 1115-24. Lóg nr. 70 frá 7. juni 1984.

---

# 39. Lóg um tannlæknar og kliniskar tannteknikarar.

Ár 1984, týsdagin 24. januar legði Páll Vang, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar.**

Løgtingið samtykkir at mæla ríkisstýrinum til at seta í gildi í Føroyum lóg nr. 276 frá 26. mai 1976 um tannlæknar, og lóg nr. 100 frá 14. mars 1979 um kliniskar tannteknikarar.

**Viðmerkingar:**
Ríkisumboðið hevur í skrivi ávikavist dagfest 7. september 1976 og 19. december 1979 sett fram fyrispurning um heimastýrið hevur nakað ímóti, at lóg nr. 276 frá 26. mai 1976 um tannlæknar og lóg nr. 100 frá 14. mars 1979 »om kliniske tandteknikere« verða lýstar at vera galdandi í Føroyum.

Landslæknin mælir til at seta nesar báðar lógir í gildi í Føroyum.

Tannlæknafelagið mælir til at seta lóg nr. 276 frá 26. mai 1976 um tannlæknar í gildi í Føroyumm men mælir frá at seta í gildi lóg nr. 100 frá 14. mars 1979 »om kliniske tandteknikere«, men ynskir í staðin eina skipan, har kliniskir tannteknikarar og tannpleygarar arbeiða undir eftirliti av tannlæknum.

Verandi tannteknikarar í Føroyum eru spurdir, um teir meta, at lóg nr. 100 frá 14. mars 1979 »om kliniske tandteknikere« eigur at verða sett í gildi í Føroyum.

Svar er komið frá nøkrum av hesum, og mæla teir til at seta lógina um kliniskar tannteknikarar í gildi í Føroyum.

1. viðgerð 27. januar 1984. Málið varð beint í lóganevndina, sum 12. mars legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð framlagt av landsstýrinum tann 24. januar 1984 og undir 1. viðgerð 27. í sama mánaði beint í lóganevndina.

Lóg nr. 276 frá 26. mai 1976 um tannlæknar avloysir lóg nr. 190 frá 11. november 1954 við seinni broytingum, ið er galdandi í Føroyum.

Nýggja lógin gevur eitt tíðarhóskandi grundarlag fyri virkseminum hjá tannlæknunum og leggur fasta støðuna hjá tannlæknum sum sjálvstøðugir persónar innan heilsutænastuna og opnar størri møguleikar fyri, at tannlæknar kunnu nyta hjálparfólk við serligari útbúgving til viðgerðar av sjúklingunum.

Eftir lógini verður eisini møguligt at viðurkenna tannlæknar sum serlæknar á ávísum økjum, soleiðis at heilsustýrið eftir nærri ásettum treytum kann geva tannlæknum loyvi til at kalla seg sertannlæknar, og soleiðis at eingir aðrir tannlæknar kunnu kalla seg sertannlæknar uttan góðkenning. Endaliga verður rætturin hjá tannlæknum um loyvi til at reklamera fyri sínum virki sterkt avmarkaðar.

Lóg nr. 100 frá 14. mars 1979 um kliniskar tannteknikarar góðkennir kliniskar tannteknikarar sum sjálvstøðugar persónar innan heilsutænastuna. Góðkenning sum kliniskur tannteknikari inniheldur

eina verju av rættindunum til at virka sum kliniskur tannlækni til at kalla seg fyri kliniskur tannteknikari. Lógin áleggur kliniskum tannteknikarum skyldur ímóti tí almenna svarandi til, hvat ið galdandi er fyri aðrar góðkendar heilsutænastupersónar.

Heitið »kliniskur tannteknikari« avloysir gamla heitið »praktiserandi tannteknikari«.

Eisini verður skilt ímillum kliniskar tannteknikarar og laboratoriitannteknikarar, har eingin góðkenning krevst eins og laboratoriiteknikarar ikki kunnu arbeiða beinleiðis við patientum, men fer arbeiði teirra fram á laboratorium.

So leingi lógin um kliniskar tannteknikarar ikki er sett í gildi í Føroyum, kann ein og hvør frítt útinna tað virksemi, sum nevnt er í lógini.

Eftir skiftisreglunum í lógini, kunnu tey, ið frammanundan hava framt virksemi, sum lógin fevnir um, fáa møguleika at fáa góðkenning sum kliniskir tannteknikarar.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

2. viðgerð 16. mars. Framhaldandi 2. viðgerð 23. mars. Uppskotið samtykt við 25-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 914-21 og 914-26-1.

---

# 40. Lækking av útlánsrentu.

Ár 1984, mikudagin 25. januar legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum alt fyri eitt at taka upp samráðingar við føroysku peningastovnarnar við tí fyri eyga at fáa hesar stovnar at

lækka útlánsrentuna, soleiðis at føroysku lánararnir og vinnulívið kunnu fáa gagn av tí lækking í útlánsrentuni, sum yvirhøvur hevur verið í vesturheiminum ta seinastu tíðina.

**Viðmerkingar:**
Árini 1979-80 hækkaði danska diskontoin — sum m.a. er tann renta, ið okkara peningastovnar gjalda fyri tann pening, sum teir læna úr tjóðbankanum — úr 8-9% uppí 13-14% og seint í 1980 var diskontoin 14%. Henda hækking bar í sær, at danskir peningastovnar hækkaðu sína rentu heilt upp í 21% fyri útlán og upp í 17% fyri innlán í serstøkum førum. Rentan á danska obligatiónsmarknaðinum hevur samstundis ligið uppi á fleiri og tjúgu prosentum.

Við teirri grundgeving, at vandi var fyri peningafluttningi úr føroyskum til danskar peningastovnar, hækkaðu føroysku peningastovnarnir rentuna hvørja ferð diskontoin hækkaði og okkara peningastovnar hava í seinastuni virkað við so stórum rentumarginali sum frá 4% upp í 10%, og inntøkur stovnanna hava tí eisini verið óvanliga høgar í 1982 og 1983. Nú er diskontoin so líðandi farin niður aftur og er hon í løtuni 7%. Grundgevingin er generella rentufallið í londum uttan um okkum og tørvurin á at styrkja kappingarføri hjá danska vinnulívinum.

Nú hesar lækkingar eru framdar í fleiri stigum úr 14% niður í 7%, hava vit lítið hoyrt frá okkara peningastovnum um rentulækking, ella um tørvin á at styrkja kappingarføri hjá føroyska vinnulívinum, herundir kappingarføri hjá skipaflotanum og fiskavirkjunum, sum skulu kappast við donsk, norsk og bretsk veiðufør og virkir — fyri ikki at tala um ídnaðarvirkir okkara, sum skulu kappast við statsstuðlaðan innflutning úr øðrum londum. Tó hevur annar av bankunum lækkað rentuna av vinnulívslánum við einum prosenti.

At enda er neyðugt at vísa á, at tær mongu skerjingar láginntøkufólki hevur verið fyri, gera at hesi illa orka at knógva undir rentum upp í 15 1/2%—16 1/4% fyri lán til búseting og bústað, sum er útreiðslur, øll mugu hava. Tað hastar tí almikið at fáa framt tilsvarandi rentulækking her heima, sum hana framd er í Danmark og næstu grannalondum okkara.

Við løgtingsmáli nr. 98/1982 legði flokkurin sama uppskot fram í mars 1983. Við 1. viðgerð varð málið beint í fíggjarnevndina, sum helt fund við Torbjørn Poulsen landsstýrismann um málið, og upplýsti landsstýrismaðurin, at landsstýrið longu hevði havt fund við peningastovnarnar um rentuna. Torbjørn Poulsen upplýsti, at pen-

ingastovnarnir nakað skjótt fóru at taka støðu til eina justering av rentuni, men tá einki er hent 10 mánaðar eftir, heldur javnaðarflokkurin tað verða neyðugt at landsstýrið av nýggjum tekur samráðingar upp við peningastovnarnar um hendan spurning og loyvir flokkurin sær tí at seta uppskotið fram av nýggjum.

1. viðgerð 27. januar 1984. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 7. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av javnaðarflokkinum tann 25. januar 1984 og undir 1. viðgerð tann 27. januar beint í fíggjarnevndina.

Umframt at vanlig nevndarviðgerð er farin fram í málinum, varð spurningurin tikin fram, tá peningastovnarnir í samband við fíggjarlógaruppskotið 1984/85 vóru á fundi í fíggjarnevndini. Peningastovnarnir høvdu tá ongar serligar viðmerkingar, men umrøtt varð, at komið kundi verið aftur til málið seinni í tingsetuni, tá løgtingsmálið fekk nevndarviðgerð. Ætlaði fundurin varð av ongum, tá tað ikki lá fyri at fáa øll tey umboð fyri peningastovnarnar á fund, sum ynskiligt var.

Nevndin hevur býtt seg í 4 minnilutar.

Minnilutin (Hilmar Kass, Ove Mikkelsen og Juul Jacobsen) førir fram:

Av tí at landið tekur ábyrgdina av stórum parti av teimum lánum, sum bankarnir geva, er tað rætt, at landið krevur gjald fyri slík veðhald ella minni rentumun millum innláns- og útlánsrentuna.

Við hesum viðmerkingum tekur nevndi minniluti undir við uppskotinum hjá javnaðarflokkinum.

Minnilutin (Ivan Johannesen) setir fram soljóðandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Heitt verður á landsstýrið um at taka upp samráðingar við peningastovnarnar um at lækka útlánsrentuna, men at eisini eigur at verða hugt eftir innlánsrentuni, so hon ikki lækkar.

Minnilutin (Sv. Åge Ellefsen og Øssur Dam Jacobsen) tekur støðu í tingsalinum.

Minnilutin (Atli P. Dam) tekur undir við uppskoti javnaðarfloksins.

2. viðgerð 8. mai. Uppskotið fall við 16-0 atkvøðum. Uppskotið frá minnilutanum í fíggjarnevndini samtykt við 23-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 11-14.

---

# 41. Norðurlanda Ráðið, broyting í samstarvssáttmálanum v.m.

Ár 1984, mikudagin 1. februar legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**I**

**Uppskot til samtyktar**

Løgtingið góðkennir, at:

a) broyting dagfest 15. juni 1983 av samstarvssáttmála frá 23. mars 1962 millum Danmark, Finland, Ísland, Noreg og Svøríki,
b) broyting dagfest 13. juni 1983 av avtalu frá 15. mars 1971 um mentunarligt samstarv millum Danmark, Finland, Island, Noreg og Svøríki,
c) broyting dagfest 15. juni 1983 av sáttmála frá 6. november 1983 um samstarv á flutnings- og samferðsluøkinum millum Danmark, Finland, Ísland, Noreg og Svøríki.

verða galdandi fyri Føroyar.

## Uppskot til

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sendinevnd Føroya til Norrøna Ráðið.**

**§ 1.** Í løgtingslóg nr. 33 frá 26. juni 1973 um sendinevnd Føroya til Norrøna Ráðið verður § 1 broytt til:
»Sendinevnd Føroya til Norðurlandaráðið telur tveir limir valdir av løgtinginum og umboð fyri landsstýri.«

**§ 2.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om ændring af lagtingslov om Færøernes delegation til Nordisk Råd.**

§ 1. I lagtingslov nr. 33 fra 26. juni 1973 om Færøernes delegation til Nordisk Råd ændres § 1 således:
»Færøernes delegation til Nordisk Råd består af 2 medlemmer valgt af lagtinget og repræsentanter for landsstyret.«

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Sáttmálarnir vórðu undirskrivaðir av samstarvsráðharrunum fyri Danmark, Finlandi, Íslandi, Noregi og Svøríki á fundi í Reykjavík tann 15. juni 1983. Teir vórðu staðfestir í fólkatinginum tann 17. november 1983 og øll londini hava boðað finsku stjórnini frá, at tey hava staðfest sáttmálarnar og komu teir tí í gildi tann 4. februar 1984.

Broytingarnar í mun til fyrr galdandi avtalur eru í høvuðsheitum:
*at* í Norðurlanda Ráðnum samarbeiða norðurlendsk lond, Føroya Landsstýri, Grønlands Landsstýri og Landsskapsstýrið á Álandi,
*at* Føroya Landsstýri kann senda óavmarkað umboð til ráðið,
*at* umboð fyri Føroya Landsstýri hevur rætt til at seta fram uppskot í Norðurlanda Ráðnum,
*at* umboð fyri Føroya Landsstýri tekur lut í arbeiðinum í ráðharraráðnum,
*at* føroyskir embætismenn kunnu luttaka í nevndum undir Norðurlanda Ráðnum og
*at* avgerðirnar í ráðharraráðnum binda tey einstøku londini, hvat viðvíkur Føroyum bert í teimum førum, Føroyar tekur undir við avgerðini sambært heimastýrislógini.

Víst verður annars til hjáløgdu viðmerkingar til sáttmálabroytingarnar.

Einasta broyting í løgtingslógini um sendinevnd Føroya til Norðurlanda Ráðið er, at nú kann landsstýrið senda óavmarkað tal til ráðið.

1. viðgerð 8. februar. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 22. februar legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 1. februar 1984 og undir 1. viðgerð 8. í sm. mán. beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í tríggjar minnilutar.

Minnilutin (Jógvan Sundstein, Olaf Olsen og Hilmar Kass) førir fram, at hann er ikki nøgdur við tað úrslit, ið fyriliggur, tí tað ikki gevur føroyingum sjálvstøðuga umboðan í Norðurlanda Ráðnum á jøvnum føti við hini norðanlondini, men út frá teimum samráðingum og tí arbeiði, ið er farið fram, at vinna okkum betri sømdir, og av tí at tað ikki í løtuni er gjørligt at vinna longri móti málinum, mælir minnilutin til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein annar minniluti (Jørgen Thomsen og Jógvan I. Olsen) mælir til at samtykkja uppskotið.

Hin triði minnilutin (Petur Reinert og Erlendur Patursson) tekur ikki undir við uppskotinum og átalar, at løgtingsformaðurin á Norðurlandaráðstingi 1983 í atkvøðugreiðsluni um hetta mál greiddi atkvøðu fyri uppskoti, ið ikki var í samljóði við gjørdar løgtingssamtyktir í sama máli.

Fyriliggjandi uppskot gevur okkum ikki nakað sjálvstøðugt umboð í Norðurlandaráðnum, soleiðis sum samtyktir løgtingsins kravdu, og kann tí ikki góðtakast.

Í hesum málið er tað framkomið, at fordingin fyri sjálvstøðugum umboði er okkara ófrælsa stjórnarstøða. Tí setir minnilutin fram soljóðandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Nú ið tað er framkomið, at núverandi ófrælsa stjórnarstøða okkara forðar okkum í at fáa sjálvstøðugt umboð í Norðurlandaráðnum og

so statt forðar okkum í at verða mettir ájavnt við aðrar norðurlandatjóðir, tekur løgtingið avleiðingarnar av hesi sannroynd og tekur til viðgerðar spurningin um loysing úr hesi ófrælsu stjórnarstøðu og stovnseting av Føroyum sum sjálvstøðugum ríki (suverenum stati).

2. viðgerð 24. februar. Uppskotið til samtyktar. I. samtykt við 22-0 og lógaruppskotið, II, § 1 samtykt við 22-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. At fara til 3. viðgerð samtykt við 22-0.

3. viðgerð á seinri fundi sama dag. Uppskotið soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 24-0. Uppskot til samtyktar frá minniluta í marknaðarnevndini fall við 7-0.

F.L.j.nr. 11-14. Lóg nr. 42 frá 10. mai 1984.

---

# 42. Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1984.

Ár 1984, mikudagin 1. februar legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið góðkennir viðløgdu skipan frá 31. januar 1984 millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1984.

**Viðmerkingar:**
Sambært skipanini millum Føroyar og Noreg um høvuðsreglurnar fyri sínámillum fiskirættindi dagfest 7. februar 1979 (løgtingsmál nr. 49/1976) skulu partarnir fyri eitt ár í senn avtala nøgdir og fiskasløg, sum loyvt verður pørtunum at fiska á sjóøkinum hjá hvørjum øðrum.

Samráðingar 31. januar 1984 vóru framhald av samráðingunum í december 1983 í Tórshavn og Bergen. Partarnir samdust um viðløgdu skipan.

Fyri veiðuna av vanligum matfiski ber skipanin fyri 1984 í sær, *at* føroysk skip á norskum fiskiøki norðanfyri 62°n.br. íroknað »gráa økið« og í fiskivarðveitingarøkinum við Svalbard fáa loyvi at veiða 4.300 tons, harav toskur 2.600 tons, hýsa 500 tons og annar fiskur 1.200 tons (í 1983 tilsamans 5.200 tons, harav ávikavist 3.500 tons av toski, 500 tons av hýsu og 1.200 tons av øðrum). Av »øðrum« (kongafiskur, upsi, svartkalvi) er bert loyvt at veiða 500 tons av hvørjum slagi, og umfatar kvotan eisini hjáveiðuna í øðrum fiskiskapi.

Umframt norsku toskakvotuna í Barentshavinum er avtalað, at 5.000 tons av tí kvotu, ið føroyingar hava fingið frá Sovjetsamveldinum kunnu veiðast í norskum sjógvi (í 1983 4.500 tons). So statt kunnu tilsamans 7.600 tons av toski verða veidd sambært sáttmálan, mótvegis 8.000 tons av toski í 1983.

Norsk skip fáa í føroyskum sjógvi loyvi at veiða 8.000 tons av botnfiski (í 1983 7.000 tons). Upsaveiðan má ikki fara upp um 1.150 tons (í 1983 1.000 tons). Í loyvdu veiðuni er íroknað hjáveiða upp til 1.200 tons; av hvørjum fiskaslagi má hjáveiðan ikki fara upp um 570 tons.

Viðvíkjandi sínámillum fiskiskapi av ídnaðarfiski ber skipanin í sær, at føroysk skip fáa loyvi at veiða 20.000 tons (sama nøgd í 1983) av hvítingsbróður, nebbasild, svartkjafti og brislingi sunnan fyri 62°N. Av hesum 20.000 tonsunum má veiðan av brislingi í mesta lagi verða 2.000 tons (í 1983 3.000 tons). Norðan fyri 62°N er loyvt føroyskum skipum í royndarfiskiskapi at veiða upp til 5.000 tons av svartkjafti (sama nøgd sum í 1983). Av sumarlodnu verður loyvt í Barentshavinum og í fiskivarðveitingarøkinum við Svalbard at veiða 10.000 tons. Umframt kunnu 20.000 tons av lodnu, av tí kvotu, ið føroyingar hava fingið frá Sovjetsamveldinum, veiðast í norskum sjógvi, harav kunnu upp til 10.000 tons veiðast sum vetrarlodna ( í 1983 var kvotan 15.000 tons frá Noreg, harav 5.000 tons kundu veiðast sum vetrarlodna, sum tó varð hækkað til 10.000

tons). Eisini vóru 20.000 tons av russiskari lodnu loyvd at fiska í norskum sjógvi sum summarlodna.

Sum hjáveiða í fiskiskapinum sunnan fyri 62°N er loyvt føroyingum at veiða upp til 1.500 tons av upsa (í 1983 500 tons).

Eftir at Noreg í 1980 setti 200 fjórðinga fiskimark rundan um Jan Mayen, ynsktu føroyingar at fáa kvotur á hesum fiskiøki, ið kundu loyva framhaldandi veiðu har. Sambært avtalunni kunnu føroyingar í 1984 veiða 5.000 tons av svartkjafti við Jan Mayen (sama nøgd sum í 1982 og 1983). Vegna stoðuna hjá lodnustovninum vildu norðmenn ikki bjóða nakra kvotu fyri 1984 (ongar kvotur í 1982 og 1983, 2.500 tons í 1981) men søgdu teir seg til reiðar at umhugsa spurningin av nýggjum, um nettokvota var ásett fyri norskari veiðu í 1984.

Fyri 1984 er avtalað ein sínámillum veiða av makreli innanfyri eina kvotu upp á ávikavist 7.000 tons til føroyingar og 15.000 tons til norðmenn (í 1983 var veiðan ávikavist 4.000/12.000 tons).

Norsk skip fáa loyvi at veiða 30.000 tons av svartkjafti (sama kvota sum í 1983 og 1982: 71.000 tons) við tilsamans 50 skipum (í 1983 50 og í 1982 60). Av skipunum mugu bert 16 (sum í 1983) verða á fiskileið ísenn, umframt 10 (sum í 1983), ið hava loyvi at leita eftir svartkjafti uttanfyri eina av vaktar- og bjargingartænastuni til eina og hvørja tíð ásetta høvuðsfiskileið.

Í 1984 verður norska brugduveiðan undir Føroyum tann sama sum í 1982 og 1983, 150 tons av livur.

Sum í 1983 umfatar sáttmálin við Noreg føroyska rækjuveiðu við Svalbard. Frá norskari síðu varð avtalan treytað av, at føroysku myndugleikarnir átóku sær at avmarka føroysku rækjuveiðuna við Svalbard til 9 skip, í meðal 5 skip kunnu fiska í senn.

Eitt yvirlit yvir tey skip, ið ætla at taka lut í sínámillum fiskiskapinum í 1984 skal verða avvarðandi føroysku og norsku myndugleikunum í hendi innan 1. mars 1984.

Sí skjal 8.

1. viðgerð 2. februar. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum á seinri fundi sama dag legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 1. februar 1984 og undir 1. viðgerð 2. februar beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Hilmar Kass, Johannes Martin Olsen, Svend Åge Ellefsen, Jógvan Sundstein) tekur undir við uppskotinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Minnihlutin (Erlendur Patursson og Ove Mikkelsen) setur einki uppskot fram, men hevur felagsálit í løgtingsmálunum
nr. 42: Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1984.
nr. 43: Skipan millum Føroyar og EEC um sínámillum fiskirættindi í 1984, og
nr. 45: Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1984.

Minnilutin (Erlendur Patursson og Ove Mikkelsen) framførir felagsálit í løgtingsmálunum.

*Viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 45/1983: Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi* vísir minnilutin á tað, sum hann fleiri ferðir áður hevur víst á, at har er yvirhøvur eingin javnvág millum tað, sum vit fáa og tað, sum vit skulu lata aftur fyri, um hetta verður roknað út til marknaðarprís og marknaðarvirði.

Eisini meta vit, at viðvíkjandi svartkjaftastovninum er við tí nøgd, vit skulu lata, vandi fyri at stovnurin verður ovurfiskaður áðrenn vit sjálvi verða før fyri at gera rætta nýtslu av hesum stovni.

*Viðvíkjandi løgtingsmálunum nr. 42/1983: Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1984 og nr. 43/1983: Skipan millum Føroyar og EEC um sínamillum fiskirættindi í 1984.*

Viðvíkjandi hesum báðum sáttmálunum skal viðmerkjast, at hesir í tí líki, teir hava, yvirhøvur ikki kunnu góðtakast longu av teirri grund, at teir loyva EEC-skipum og norskum skipum at veiða 25.000 tons av botnfiski, sum er ein fjórðingur av samlaða TAC av botnfiski á Føroya-leiðini.

*Viðvíkjandi Noregs-sáttmálanum.*

Serstakliga skal minnilutin viðmerkja, at tað kann ikki góðtakast, at Noreg einvíst tilroknar sær ræði av fiskivarðveitingarøkinum við Svalbard og setur avmarkingar bæði viðvíkjandi veiðinøgd og veiðiorku galdandi fyri føroyingar einsamallar, tí hetta má metast sum diskriminering.

Viðari hava vit eftir USSR sáttmála longu goldið til russar fyri tann tosk, sum russar geva okkum loyvi at veiða á russiskum øki, og hesin toskur er sostatt goldin tvær ferðir.

*Viðvíkjandi EEC-sáttmálanum* kann ikki góðtakast:

1. *at* EEC-skip fáa loyvi at veiða á Føroyagrunninum við reiðskapi (100/120 mm meskavídd og snørdar trolposar), sum eftir føroyskari lóg er bannaður,
2. *at* EEC-skip fáa frammíhjárætt at veiða á ávísum leiðum, ið eru friðaðar fyri føroysk skip,
3. *at* eiheldur at vit skulu avmarka okkara laksaveiðu á føroyskum øki fyri at fáa hendan sáttmála í gildi og hervið hevur EEC enn einaferð lagt seg uppí føroysk innanhýsisviðurskifti og lóggeving,
4. Samstundis átalar tjóðveldisflokkurin, at landsstýrið fyrileggur fyri EEC til góðkenningar friðingartiltøk á landleiðini, áðrenn vit fingu nakran sáttmála við hesi lond.

Eitt prógv fyri, hvussu stórt vald EEC hevur yvir okkara landsstýrissamgongu er, at vit í fjør — vegna okkara EEC-sáttmála — ikki kundu seta tær friðingarreglur í gildi, sum longu tá vóru bráðneyðugar.

*Sum heild* fyri allar tríggjar sáttmálarnar:
lata vit alt ov nógv av okkara lítla og fáa alt ov lítið afturfyri av teirra nógva.

Minnilutin (Jørgen Thomsen) vísir á, at samráðingar við Noreg hava ofta verið truplar.

Tað hevur altíð verið neyðugt við fleiri samráðingarumførum fyri at fáa fyri føroyingar eina nýtiliga avtalu. Í fjør var tó ørðvísi. Tá hendi tað, at føroyska samráðingarnevndin undirskrivaði sáttmálan eftir bert einum samráðingarumfari. Hesin sáttmáli umfataði m.a. avmarkingar í føroysku rækjuveiðuni við Svalbard.

Javnaðarflokkurin tók ikki undir við sáttmálanum í fjør, men mælti til, at nýggjar samráðingar vórðu tiknar upp við Noreg. Flokkurin vísti m.a. á í samband við rækjuveiðuna við Svalbard, at flokkurin vildi ganga við til avmarkingar við Svalbard, tá slíkar vóru neyðugar samb. vísindalig prógv. Men tá skuldi vera ein felags avmarking. Ein avtala millum allar teir, sum veiða rækjur við Svalbard, t.v.s. russar, spaniólar, norðmenn og føroyingar.

Javnaðarflokkurin ásannar, at mistakið, sum samráðingarnevndin, landsstýrið og samgongumenn á tingi gjørdu í fjør, ikki er rættað

við sáttmálanum fyri 1984, og má flokkurin eisini ásanna, at samgongan ikki hevur megnað at rætta hetta mistak.

Javnaðarflokkurin hevur altíð mett, at fiskirættindarsáttmálarnir við Noreg og Sovjet Hava stóran týdning fyri føroyingar, serstakliga fyri flaka- og saltfiskatrolararnar. Hesir sáttmálar hava verið grundarlagið hjá hesum trolarum. Teir hava givið manningunum góða úrtøku, og eisini hava teir skapt arbeiði á landi.

Minnilutin mælir út frá hesum til, at sáttmálin verður samtyktur.

2. viðgerð á seinri fundi sama dag. Málið varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1500-1-II-5.

---

# 43. Skipan millum Føroyar og EEC um sínámillum fiskirættindi í 1984.

Ár 1984, mikudagin 1. februar legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið viðløgdu skipan, dagf. 14.

december 1983, um sínámillum fiskirættindi í 1984 millum Føroyar og EEC.

**Viðmerkingar:**
*1.* 13. og 14. december 1983 hava samráðingar verið í Bruxelles millum umboð fyri Føroya landsstýri og EEC-nevndina um sínámillum fiskirættindi í 1984 millum Føroyar og EEC. Urslitið av samráðingunum er viðlagda skipan, undirritað í Brüssel 14. december 1983.
*2.* Loyvdu veiðunøgdirnar í 1984 av ósløgdum fiski eru hesar:
*Hjá EEC-skipum á landleiðini:*

Samlaða nøgdin av svartkjafti, makreli og botnfiski verður í 1984:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1.200 | tons | av | av toski og hýsu |
| 3.500 | - | - | upsa |
| 5.100 | - | - | kongafiski |
| 4.500 | - | - | blálongu |
| 500 | - | - | longu |
| 400 | - | - | brosmu |
| 660 | - | - | flatfiski |
| 500 | - | - | ymiskum fiskasløgum |
| 25.000 | - | - | svartkjafti |
| 5.000 | - | - | makreli |

*Hjá føroyskum skipum í EEC-sjógvi:*

(a) 500 tons av longu og 500 tons av brosmu á Rock All-leiðini. Eisini er loyvt at veiða 750 tons av ymsum botnfiski sum hjáveiðu í ídnaðarfiskiskapi; í 1983 vóru nøgdirnar tær somu. Eisini er loyvt at veiða 1.100 tons av blálongu á havleiðunum vestanfyri Skotland (í 1983: 700 tons).

(b) 9.000 tons av tí vestara makrelstovninum; í 1983 var loyvt at veiða 10.000 tons. Um fiskiskapur á eystara makrelstovninum verður loyvdur í 1984, skulu tingingar fara fram millum partarnar.

(c) 6.000 tons av rossamakreli, sama nøgd sum í 1983.

(d) 20.000 tons av hvítingsbróður, 10.000 tons av nebbasild og 5.000 tons av brislingi; 1983-tølini vóru ávikavist 15.000 tons, 15.000 tons og 15.000 tons. Fiskast kunnu tó eyka 10.000 tons av hvítingsbróður og nebbasild (íroknað hjáveiðu av svartkjafti, sum ikki slepst undan) treytað av, at samlaða veiðunøgdin fyri hvítingsbróður, nebbasild og brisling ikki fer upp um 35.000 tons (í 1983 45.000 tons).

(e) 1.620 tons av sild vestan fyri Skotland, (í 1983 1.800 tons).
(f) 45.000 tons av svartkjalti (í 1983 30.000 tons, sum seinri vórðu avtalað hækkað við 10.000 tonsum, ímóti lækking av kvotunum fyri ávikavist hvítingsbróður og nebbasild við 6.250 tonsum.)
(g) 500 tons av sild í Skagerak; sama nøgd sum í 1983.
(h) 450 tons av rækjum í Vesturgrønlandi í NAFO-øki 1; (í 1983 475 tons). 650 tons av rækjum í Eysturgrønlandi í ICES-øki XIV (í 1983 675 tons).
(i) 100 tons av svartkalva undir Vesturgrønlandi og 100 tons undir Eysturgrønlandi. Í 1983 vóru nøgdirnar ávikavist 150/150.
(j) 150 tons av hemara í øllum EEC-sjógvi. Tó ikki í NAFO 3Ps (St. Pierre og Miquelon) (í 1983 var nøgdin 300 tons).
(k) Eisini verður loyvt at veiða 400 tons av kongafiski í ICES-øki XIV (Eysturgrønlandi) (í 1983: 500 tons).
(l) Loyvt er í 1983 at veiða 7.000 tons av lodnu við Eysturgrønland, um EEC loyvir sínum bátum at veiða av stovninum.

*3.* Tað eydnaðist ikki at fáa tillutað nakra toskakvotu við Vesturella Eysturgrønland, hóast slíkar kvotur hava verið latnar øðrum ikki-grønlendskum fiskimonnum í 1983 og at EEC-myndugleikarnir eisini ætlaðu at loyva slíkum fiskiskapi í 1984. Hesum mótmælir føroyska sendinevndin í serligari yvirlýsing.

Heldur ikki eydnaðist at fáa lyfti frá EEC um sildarkvotu í Norðsjónum (ICES-øki IV). Í yvirlýsingini boðaði føroyska sendinevndin eisini frá, at um hesin sildafiskiskapur varð uppaftur tikin í 1984, vildi hon taka stig til samráðingar við tí í hyggju at áseta kvotu fyri Føroyar.

*4.* EEC hevur eins og tvey tey seinastu árini undir samráðingunum um sínámillum fiskiveiðu sett sum treyt fyri eini avtalu í 1984, at føroyingar átóku sær at avmarka laksaveiðuna, vísandi til at ein munandi partur av tí laksi, ið verður fiskaður við Føroyar, stavar frá áum í EEC-londum.

Av hesi orsøk hava føroyingar gingið við til í serligum brævaskifti at vátta, at vit vilja avmarka laksaveiðu okkara til 625 tons í 1984/85 (fiðarskeiðið 1. oktober 1984 — 31. mai 1985).

Marknaðarnevndin hevur á fundi tann 28. december 1983 fyribils góðkent sáttmálan.

Sí skjal 9. A-B.

1. februar bað formaðurin um loyvi at frávíkja tðarfreistini í málunum 42, 43 og 45. Biðið varð um atkvøðugreiðslu. Málið fall við 15-1.

Á næsta fundi varð aftur biðið um loyvi at frávikja tíðarfreistini í málunum sum vóru á dagsskrá. Biðið varð um atkvøðugreislu.

Málið fall við 19 ja-atkvøðum, 4 nei-atkvøðum, 7 atkvøddu ikki, 2 vóru burturstaddir. Kvalifiseraður meiriluti kravdist. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

| | |
|---|---|
| Ja atkvøddu: | Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Vilhelm Johannesen, Finnbogi Isaksen, Arne Ziskasen, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Olaf Olsen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen, Jacob Lamhauge, Eli Nolsøe, Dánjal Larsen, Jógvan Sundstein. |
| Nei atkvøddu: | Adolf Hansen, Jóannes Dalsgaard, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson. |
| Atkvøddu ikki: | Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Jacob Lindenskov, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Hans M. Joensen. |
| Burturstaddur: | Atli Dam, Juul Jacobsen. |

1. viðgerð á seinri fundi sama dag. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum seinri sama dag legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 1. februar 1984 og undir 1. viðgerð 2. februar beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Hilmar Kass, Johs. Martin Olsen, Svend Åge Ellefsen, Jógvan Sundstein) tekur undir við uppskotinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Ein minniluti (Erlendur Patursson og Ove Mikkelsen) setir einki uppskot fram, hevur felagsálit í málunum nr. 42: Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskiraettindi í 1984,
nr. 43: Skipan millum Føroyar og EEC um sínámillum fiskiraettindi í 1984,

nr. 45: Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1984.

Minnilutin (Erlendur Patursson og Ove Mikkelsen) framforir felagsálit í løgtingsmálunum.

*Viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 45/1983: Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi* vísir minnilutin á tað, sum hann fleiri ferðir áður hevur vist á, at har er yvirhøvur eingin javnvág millum tað, sum vit fáa og tað, sum vit skulu lata aftur fyri, um hetta verður roknað út til marknaðarpris og marknaðarvirði.

Eisini meta vit, at viðvíkjandi svartkjaftastovninum er vio ti nøgd, vit skulu lata, vandi fyri at stovnurin verður ovurfiskaður áðrenn vit sjálvi verða før fyri at gera rætta nýtslu av hesum stovni.

*Viðvíkjandi løgtingsmálunum nr. 42/1983: Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1984 og nr. 43/1983: Skipan millum Føroyar og EEC um sínámillum fiskirættindi í 1984.*

Viðvíkjandi hesum báðum sáttmálunum skal viðmerkjast, at hesir í tí líki, teir hava, yvirhøvur ikki kunnu góðtakast longu av teirri grund, at teir loyva EEC-skipum og norskum skipum at veiða 25.000 tons av botnfiski, sum er ein fjórðingur av samlaða TAC av botnfiski á Føroya-leiðini.

*Viðvíkjandi Noregs-sáttmálanum.*

Serstakliga skal minnilutin viðmerkja, at tað kann ikki góðtakast, at Noreg einvíst tilroknar sær ræði av fiskivarðveitingarøkinum við Svalbard og setur avmarkingar bæði viðvíkjandi veiðinøgd og veiðiorku galdandi fyri føroyingar einsamallar, tí hetta má metast sum diskriminering.

Víðari hava vit eftir USSR sáttmála longu goldið til russar fyri tann tosk, sum russar geva okkum, loyvi at veiða á russiskum økj. og hesin toskur er sostatt goldin tvær ferðir.

*Viðvíkjandi EEC-sáttmálanum* kann ikki góðtakast:

1. *at* EEC-skip fáa loyvi at veiða á Føroyagrunninum við reiðskapi (100/120 mm meskavídd og snørdar trolposar), sum eftir føroyskari lóg er bannaður,
2. *at* EEC-skip fáa frammihjáratt at veiða á ávísum leiðum, ið eru friðaðar fyri føroysk skip.

3. *at* eiheldur at vit skulu avmarka okkara laksaveiðu á føroyskum øki fyri at fáa hendan sáttmála í gildi og hervið hevur EEC enn einaferð lagt seg uppí føroysk innanhýsisviðurskifti og lóggeving,
4. Samstundis átalar tjóðveldisflokkurin, at landsstýrið fyrileggur fyri EEC til góðkenningar friðingartiltøk á landleiðini, áðrenn vit fingu nakran sáttmála við hesi lond.

Eitt prógv fyri, hvussu stórt vald EEC hevur yvir okkara landsstýrissamgongu er, at vit í fjør — vegna okkara EEC-sáttmála — ikki kundu seta tær friðingarreglur í gildi, sum longu tá vóru bráðneyðugar.

*Sum heild* fyri allar tríggjar sáttmálarnar:
lata vit alt ov nógv av okkara lítla og fáa alt ov lítið aftanfyri av teirra nógva.

Ein annar minniluti (Jørgen Thomsen) er av teirri ákoðan, at vit eiga at hava fiskivinnusáttmálar við onnur lond, har tað er gjørligt, men ásannar, at úrslitið av samráðingunum við EF heldur ikki hesa ferð er nøktandi fyri okkum.

Minnilutin metir, at politikkur samgongunnar í viðurskiftum okkara mótvegis EF er alt ov veikur og undirbráttligur.

Tað kann ikki góðtakast, at vit á hvørjum ári skulu geva EF eyka søndir á okkara sjóøki, sum t.d. at loyva EF tolarum at veiða við smærri trolmeskum enn okkara egnu trolarar hava loyvi at nýta, og í ár eru teirra fiskimøguleikar gjørdir rúmari og leiðirnar størri, ja heilt inn á 12 fjórðinga markið.

Heldur ikki kann tað góðtakast, at EF skal avgera, hvussu stórar nøgdir av laksi kunnu veiðast á okkara egna sjóøki.

Javnaðarflokkurin er av teirri áskoðan, at spurningurin viðvíkjandi laksinum á okkara sjóøki skal loysast við samráðingum á altjóða stigi. Fundur hesum viðvíkjandi verður í mai í ár, og eiga vit tá at gera okkara ávirkan galdandi.

Javnaðarflokkurin metir, at gongdin í sáttmálasamráðingunum við EF, ið sitandi samgonga hevur ført, framvegis meiri hevur verið til fyrimuns fyri áður nevnda felagsskap enn fyri okkum føroyingar.

Út frá hesum kann flokkurin ikki taka undir við fyriliggjandi uppskoti, men setir eitt nú uppskot fram.

2. viðgerð sama dag. Málið varð samtykt við 19 atkvøðum fyri og 1 ímóti.

F.L.j.nr. 1500-1-11-2.

# 44. Broyting í reglunum um umfarssølu.

Ár 1984, mikudagin 1. februar legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um broyting í reglunum um vinnu.**

§ 1. Í løgtingslóg nr. 8 frá 19. mars 1969 um broyting í løgtingslóg um broyting í reglunum um vinnu v.m. verður í § 1, stk. 1, litra C, skoytt uppí: »eins og til tekning av avtalum um hjálparveiting«.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om ændring i bestemmelserne om næring m.v.**

§ 1. I lagtingslov nr. 8 af 19. marts 1969 om ændring i lagtinslov om ændring i bestemmelserne om ændring m.v. foretages i § 1, stk. 1, litra C, følgende tilføjelse: »samt til tegning af aftaler om ydelse af assistance«.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Eftir galdandi lóg nr. 8 frá 19. mars 1969 er umfarssøla bert loyvd av fiski, mjólk og róma, men kann landsstýrið harumframt í serstøkum førum geva loyvi til umfarssølu og upptøku av bíleggingum av bókum.

Landsstýrið hevur fingið umsókn frá einum felag um loyvi at kunna ganga hús úr húsi at tekna avtalur um hjálparveiting til bileigarar og húsaeigarar. Mett verður neyðugt við umfarssølu fyri at fáa nóg nógvar avtalur til at skipanin skal kunna bera seg.

Landsstýrið heldur tað vera hent hjá fólki at hava slíka avtalu um hjálpartænastu og mælir til at samtykkja frammanfyri nevnda uppskot um broyting í lógini.

1. viðgerð 6. februar. Málið varð beint í lóganevndina, sum 9. mars legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 1. februar 1984 og við 1. viðgerð 6. í sama mánað beint í lóganevndina.

Eftir galdandi lóg er umfarssøla, t.v.s. søla við at ganga á dyrnar hjá fólki, bert loyvd av fiski og mjólk. Landsstýrið kann tó í serstøkum førum geva loyvi til umfarssølu og upptøku av bíleggingum av bókum, bløðum og tíðarritum.

Eftir uppskotinum verður mælt til at víðka rættin til umfarssølu eisini at galda tekning av avtalum um ymiska hjálparveiting.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Asbjørn Joensen, Arne Ziskasen, Petur Reinert og Agnar Nielsen) setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jacob Lindenskov) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

2. viðgerð 16. mars. Uppskot landsstýrisins § 1 samtykt við 19-0, § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 20. mars. Málið endaliga samtykt við 20-1 atkvøðum.

F.L.j. nr. 1107-4-2. Lóg nr. 41 frá 10. mai 1984.

---

# 45. Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi.

Ár 1984, mikudagin 1. februar legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið góðkennir viðløgdu skipan frá 2. december 1983 millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1984.

**Viðmerkingar:**
Sambært skipanina millum Føroyar og Sovjetsamveldið um høvuðsreglurnar fyri sínámillum fiskiskap (tingmál nr. 18/1977) skulu partarnir fyri 1 ár í senn avtala nøgdir og fiskasløg, sum loyvt verður pørtunum at fiska á sjóøkinum hjá hvørjum øðrum.

Samráðingarnar um eina slíka avtalu fyri sínámillum fiskiskap í 1984 vóru í Moskva í døgunum 28. november — til 2. december 1983, og samdust partarnir um viðløgdu skipan sambært skjal 1.

Sambært avtaluni fáa føroysk skip loyvi til á havleiðum, ið liggja úti fyri sovjetisku strondini í Barentshavinum og í Eystrasalti, og sum er undir sovjetiskari lóggávu uttan fyri 12 fjórðingar at veiða 15.500 tons av toski, íroknað hjáveiðu av hýsu og øðrum botnfiski. Av nevndu 15.500 tonsum av toski og hýsu, íroknað hjáveiðu kunnu minst 6.000 tons veiðast í felagsøkinum í Barentshavinum, og minst 4.500 í Eystrasalti, og hini 5.000 tonsini av kvotuni kunnu tó veiðast í norska partinum av Barentshavinum, treytað av góðkenning frá norsku myndugleikunum, sum er fingin sambært løgtingsmál nr. 45/1983.

Føroysk skip kunnu harnæst veiða 20.000 tons av lodnu í Barentshavinum. Lodnuveiðan er tó í tíðini 1. mai — 31. august 1984.

Afturfyri verður loyvt russiskum skipum at veiða á sjóøki Føroya 100.000 tons av svartkjafti til matna.

Frá sovjetiskari síðu verður eingin avmarking ásett fyri talið av føroyskum fiskiførum.

Frá føroyskari síðu verður talið av sovjetiskum fiskiførum í svartkjaftaveiðuni avmarkað til 16 í tíðarskeiðinum januar-august og 10 í tíðarskeiðinum september-december.

Partarnir samdust um í 1984 at halda fram við sínámillum royndarfiskiskapinum.

Føroyskum skipum verður loyvt at reka royndarfiskiskap eftir rækjum í teimum pørtunum av Barentshavinum, ið liggja út fyri sovjetisku strondini, og sum eru undir sovjetiskari lóggávu uttan fyri 12 fjórðingar.

3 sovjetisk skip kunnu samstundis fáa loyvi at gera royndarfiskiskap í føroyskum sjógvi, djúpri enn 700 m. Loyvt verður einum av fyrrnevndu 3 skipum at reka djúpvatnsroyndarfiskiskap íroknað dýpið milum 500-700 metrar rundan um Ytra Bailey Banka, tó so at samlaða veiðan av botnfiski hægst skal vera 200 tons.

Royndarfiskiskapur skal fremjast sambært fiskiætlanum, sum partarnir skulu siga hvørjum øðrum frá pr. telex frammanundan.

Áhugi var fyri nærri vísindaligum samstarvi og í hesum sambandi luttøku í millumlanda samstarvi viðvíkjandi svartkjafti og síld.

Loyvt verður einum sovjetiskum skipi við drívgørnum at reka royndarfiskiskap av Atlanto-skandisku síldini á føroyskum sjóøki. Við hesum skipi kunnu føroyskir serfrøðingar vera umborð.

Loyvt verður 1-2 sovjetiskum skipum at reka royndarfiskiskap eftir makreli og høgguslokki á føroyskum sjóøki á teimum leiðum, har sovjetisk skip hava loyvi at veiða svartkjaft. Við hesum skipum kunnu vera upp til 4 føroyskir serfrøðingar umborð. Samlaða veiðan av hvørjum av hesum fiskasløgum má ikki fara upp um 2.000 tons.

Fyri allan royndarfiskiskapin á føroyskum øki er galdandi, at føroyingar kunnu seta sínar serfrøðingar umborð á sovjetisku skipini.

1. februar bað formaðurin um loyvi at frávíkja tíðarfreistini til viðgerðar av málunum 42, 43 og 45. Biðið varð um atkvøðugreiðslu. Málið fall við 15-1.

Á næsta fundi varð aftur biðið um loyvi at frávíkja tíðarfreistini í málunum sum vóru á dagsskrá. Biðið varð um atkvøðugreiðslu.

Málið fall við 19 ja-atkvøðum, 4 nei-atkvøðum, 7 atkvøddu ikki, 2 vóru burturstaddir. Kvalifiseraður meiriluti kravdist. Atkvøtt við navnakalli varð soleiðis:

| | |
|---|---|
| Ja atkvøddu: | Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Vilhelm Johannesen, Finnbogi Isaksen, Arne Ziskasen, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Olaf Olsen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen, Jacob Lamhauge, Eli Nolsøe, Dánjal Larsen, Jógvan Sundstein. |
| Nei atkvøddu: | Adolf Hansen, Jóannes Dalsgaard, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson. |
| Atkvøddu ikki: | Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Jacob Lindenskov, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Hans M. Joensen. |
| Burturstaddur: | Atli Dam, Juul Jacobsen. |

1. viðgerð 2. februar. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum á seinri fundi sama dag legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 1. februar 1984 og undir 1. viðgerð 2. februar beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hilmar Kass, Johs. Martin Olsen, Svend Åge Ellefsen, Jógvan Sundstein og Jørgen Thomsen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Minnilutin (Erlendur Patursson og Ove Mikkelsen setir einki uppskot fram, men hevur felagsálit til løgtingsmálini
nr. 42: Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1984,
nr. 43: Skipan millum Føroyar og EEC um sínámillum fiskirættindi í 1984, og
nr. 45: Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1984.

Minnilutin (Erlendur Patursson og Ove Mikkelsen) framførir felagsálit í løgtingsmálunum.

*Viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 45/1983: Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi* vísir minnilutin á tað, sum hann fleiri ferðir áður hevur víst á, at har er yvirhøvur eingin javnvág millum tað, sum vit fáa og tað, sum vit skulu lata aftur fyri, um hetta verður roknað út til marknaðarprís og marknaðarvirði.

Eisini meta vit, at viðvíkjandi svartkjaftastovninum er við tí nøgd, vit skulu lata, vandi fyri at stovnurin verður ovurfiskaður, áðrenn vit sjálvi verða før fyri at gera rætta nýtsla av hesum stovni.

*Viðvíkjandi løgtingsmálunum nr. 42/1983: Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1984 og nr. 43/1983: Skipan millum Føroyar og EEC um sínámillum fiskirættindi í 1984.*

Viðvíkjandi hesum báðum sáttmálunum skal viðmerkjast, at hesir í tí líki, teir hava, yvirhøvur ikki kunnu góðtakast longu av teirri grund, at teir loyva EEC-skipum og norskum skipum at veiða 25.000 tons av botnfiski, sum er ein fjórðingur av samlaða TAC av botnfiski á Føroya-leiðini.

**Viðvíkjandi Noregs-sáttmálanum.**

Serstakliga skal minnilutin viðmerkja, at tað kann ikki góðtakast, at Noreg einvíst tilroknar sær ræði av fiskivarðveitingarøkinum við Svalbard og setur avmarkingar bæði viðvíkjandi veiðinøgd og veiðiorku galdandi fyri føroyingar einsamallar, ti hetta má metast sum diskriminering.

Víðari hava vit eftir USSR sáttmala longu goldið tit russar ivri tann tosk, sum russar geva okkum loyvi at veiða á russiskum øki, og hesin toskur er sostatt goldin tvær ferðir.

*Viðvíkjandi EEC-sáttmálanum* kann ikki góðtakast:

1. *at* EEC-skip fáa loyvi at veiða á í øroyagrunninum við reðskelpi (100/120 mtn meskavídd og snørdar trolposar), sum eftir føroyskari lóg er bannaður,
2. *at* EEC-skip fáa frammíhjárætt at veiða á ávisum leiðum, ið eru friðaðar fyri føroysk skip,
2. *at* eiheldur at vit skulu avmarka okkara laksaveiðu á føroyskum øki fyri at fáa henda sáttmála í gildi og hervið hevur EEC enn einaferð lagt seg uppí føroysk innanhýsisviðurskifti og lóggeving
4. Samstundis átalar tjóðveldisflokkurin, at landsstýrið fyrileggur fyri EEC til góðkenningar friðingartiltøk á landleiðini, áðrenn vit fingu nakran sáttmála við hesi lond.

*Sum heild* fyri allar triggjar sáttmálarnar:
lata vit alt ov nógv av okkara lítla og fáa alt ov lítið afturfyri av teirra nógva.

Minniluṭin (Jørgen Thomsen) vísir á, at samráðingar við Noreg hava ofta verið truplar.

Tað hevur altíð verið neyðugt við fleiri samráðingarumførum fyri at fáa fyri føroyingar eina nýtiliga avtalu. Í fjør var tó øðrvísið. Tá hendi tað, at føroyska samráðingarnevndin undirskrivaði sáttmálan eftir bert einum samráðingarumfari. Hesin sáttmáli umfataði m.a. avmarkingar í føroysku rækjuveiðuni við Svalbard.

Javnaðarflokkurin tók ikki undir við sáttmálanum í fjør, men mælti til, at nýggjar samráðingar vórðu tiknar upp við Noreg. Flokkurin vísti m.a. á í samband við rækjuveiðuna við Svalbard, at flokkurin vildi ganga við til avmarkingar við Svalbard, tá slíkar vóru neyðugar samb. vísindalig prógv. Men tá skuldi vera eitt telagt avmarking. Tað avtala millum allar teir, sum veiða rækjuna við Svalbard, t.v.s. russar, samráðingarnevndin og føroyingar.

Javnaðarflokkurin ásannar at mistakið, sum samráðingarnevndin, landsstýrið og samgongumenn á tingi gjørdu í fjør, ikki er rættað við sáttmálanum fyri 1984 og má flokkurin eisini ásanna, at samgongan ikki hevur megnað at rætta hetta mistak.

Javnaðarflokkurin hevur altíð mett at fiskirættindarsáttmálarnir við Noreg og Sovjet hava stóran týdning fyri føroyingar, serstakliga fyri flaka- og saltfiskatrolararnar. Hesir sáttmálar hava verið grundarlagið hjá hesum trolarum. Teir hava givið manningunum góða úrtøku og eisini hava teir skapt arbeiði á landi.

Minnilutin mælir út frá hesum til. at sáttmálin verður samtyktur.

Eitt prógv fyri, hvussu stórt vald EEC hevur yvir okkara landsstýrissamgongu er, at vit í fjør — vegna okkara EEC-sáttmála — ikki kundu seta tær friðingarreglur í gildi, sum longu tá vóru bráðneyðugar.

*Sum heild* fyri allar tríggjar sáttmálarnar:
lata vit alt ov nógv av okkara lítla og fáa alt ov lítið afturfyri av teirra nógva.

2. viðgerð á seinri fundi sama dag. Málið varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1500-1-11-2

---

# 46. Veðhald fyri láni til P/f Smyril-Line.

Ár 1984, mánadagin 6. februar legði Pauli Ellefsen, løgmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

# Uppskot

# til

**løgtingslóg um veðhald fyri láni til p/f Smyril-Line.**

**§ 1.** Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri einum láni upp til 12 mió. kr. til p/f Smyril-Line.
*2.stk.* Treyt fyri veðhaldinum er, at felagið útvegar í minsta lagi 1.350.000 kr. afturat í láni. Lánið má ikki kunna krevjast afturgoldið eftir styttri tíð enn afturgjaldingartíðin galdandi fyri tað lánið, landskassin veðheldur fyri.

**§ 2.** Hendan lóg kemur í gildi beinanveg.

**lagtingslov om garanti for lån til p/f Smyril-Line.**

**§ 1.** Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et lån op til 12 mio. kr. til p/f Smyril-Line.
*Stk. 2.* Det er en betingelse for garantien, at selskabet fremskaffer et yderligere lån på mindst 1.350.000 kr. Lånet skal ikke kunne kræves tilbagebetalt på kortere tid end den tilbagebetalingstid, der er gældende for det lån, som landskassen garanterer for.

**§ 2.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Í løgtingsmálunum nr. 51 og 123 1982 tekl landsstýrið saman við fíggjarnevndini heimild til at seta upp til 20% av partapeningnum í felag til keyp og umbygging av ferðamannaskipinum »Gamla Vasa« og heimild til landskassans vegna at veðhalda fyri prioritetslánum upp til 19% av virði skipsins. Fyritreyt var, at skipið varð sett í millumlanda sigling.

P/f Smyril Line keypti og umbygdi skipið, kostnaðurin varð 138.000.000 kr. Skipið fekk navnið »Norrøna«. Landsstýrið og fíggjarnevndin kravdu, at partapeningurin varð 10% av fløguni ella 13.800.000 kr. Partapeningurin er tryggjaður beinleiðis og óbeinleiðis.

Landsstýrið hevur goldið sín part av partapeninginum 2.760.000 kr. Eisini hevur landsstýrið veðhildið fyri prioritetsláni, ið er 4% av skipsvirðinum, tryggjað við panti innan fyri 46% og veðhildið fyri

prioritetsláni, ið er 15% av skipsvirðinum, tryggjað við panti innan fyri 90%.

»Norrøna« varð sett í fasta farleið um 14 vikur summarið 1983 í millumlandasigling frá Føroyum. Eftir rakstrarætlanini, løgd fyri løgtingið í løgtingsmálinum nr. 51/1982, skuldi skipið leigast/chartrast veturin 1983/84. Leigumálið varð tó av ongum, í staðin setti felagið skipið inn í fasta farleið millum Korsør og Kiel.

Rakstrarúrslitið frá summarsiglingini er eitt avlop upp á 5,7 mió. kr., tá eru útreiðslur til rentur og avskriving ikki tiknar við. Farleiðin Korsør-Kiel hevur til 31. december 1983 givið 7,5 mió. kr. í halli, tá er heldur ikki renta og avskriving íroknað.

Ætlan felagsins er, at »Norrøna« skal sigla í farleiðini Korsør-Kiel til apríl/mai 1984 og síðani sigla uttanlandssigling frá Føroyum í summar. Til farleiðina Korsør-Kiel summarið 1984 verður leigað/chartrað ferðamannaskip.

Fíggjarliga myndin, felagið setur upp við hesi ætlan, er, at summarsiglingin í 15 vikur hjá »Norrønu« gevur eitt avlop upp á 55 mió. kr. áðrenn rentur og avskriving. Til hesa ætlanina sigur felagið, at hon er gjørd, áðrenn DFDS hevði gjørt av at seta »Winston Churchill« í sigling í summar 2 ferðir um vikuna København-Tórshavn-København. Viðvíkjandi farleiðini Korsør-Kiel roknar felagið í mánaðunum januar, februar og mars við einum halli upp á 5 mió. kr., men fyri aftur árið 1984 11 mió. kr. í avlopi, tá eru útreiðslur til rentu og avskriving íroknaðar.

Felagið søkir nú um eitt landskassaveðhald fyri 12 mió. kr. í láni. Herafturat er ætlanin, at felagið skal læna 1.350.000 kr., sum nevnd felagsins veðheldur fyri.

Eftir fyribils roknskapinum pr. 31. december 1983 er eginpeningurin negativur við 7 mió. kr., men tá restar í at inngjalda av teknaða partapeninginum uni 3,9 mió. kr. Hesin frestandi partapeningurin kemur tó ikki eftir einum degi.

Eftir sama roknskapi er samlaða hallið 12 mió. kr., íroknað rentuútreiðslur, men ikki avskrivingar. Herafturat má roknast hallið á Korsør-Kiel farleiðini januar-apríl 1984 5 mió. kr. Likviditetshallið verður tá ultimo mars um 17 mió. kr. Verður teknaði partapeningurin goldin, er hallið 13 mió. kr.

Landsstýrið heldur, at felagið átti at ráðført seg við landsstýrið, sum vegna landskassan hevur bundið seg við so nógvum peningi í hetta felag, áðrenn tað fór undir at broyta so munandi tær ætlanir,

sum tað legði fram, tá tilsøgnir um partapening og veðhald lógu fyri.

Í hesum førinum hevur landsstýrið ikki annað tilfar at halda seg til enn tað, felagið leggur fram um ætlað rakstrarúrslit. Eftir tilfarinum er tað ikki beina loysnin at steðga farleiðini Korsør-Kiel nú, síðani hon gevur avlop frá 1. apríl. Verður farleiðin steðgað, so hevur felagið longu nú sett seg í so nógva skuld, at tað er ivasamt, um »Norrøna« siglir uttanlands í summar.

Rakstrarlán upp á tilsamans 13.350.000 kr. røkka helst ikki til, tá ið likviditetinum umræður. Lánini kunnu fáast í banka í Føroyum. Talan er um at krevja best møguligt pant verður tryggjað landskassaveðhildna láninum, men óvist er, um tað letur seg fremja, síðani panthavarar hava treytað sær at geva loyvi til nýggja pantseting. Veðhaldsskipanin er nakað lík skipanini um veðhald fyri tey sonevndu kreppulánini.

Lagt verður afturat, at landsstýrið sum veðhaldari hevur lagt út í falnum rentum 1.212.955,55 kr.

Samtykt varð við 25-0 atkvøðum at frávíkja tíðarfreistini til viðgerð av hesum máli.

1. viðgerð sama dag. Málið var beint í fíggjarnevndina, sum sama dag legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 6. februar 1984 og undir 1. viðgerð sama dag beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og eftir áheitan frá fíggjarnevndini komu Olí Hammer, stjóri fyri Smyril-Line og grannskoðari felagsins C. V. Veihe á fund.

Stjóri felagsins greiddi frá rakstrarviðurskiftunum í tilknýti til Korsør-Kiel rutuna og undirstrikaði, at tað á ferðasambandsøkinum tekur tíð at bróta upp úr nýggjum og at svárasta skeiðið er januar-mars; aftaná tá kemur munandi vend í. Upplýsti talið á ferðafólki, sum seinastu veek-end er vaksið væl í mun til áður.

Leiðslan fyri felagið setur góðar vónir til summarferðingarnar. Útgreinaði tær upplýsingar, sum landsstýrið hevur í viðmerkingum til málið. Nevndi at bíleggingin av ferðaseðlum gongur væl.

Fíggjarnevndin setti fram ymsar spurningar um ávísar tættir í virksemi felagsins.

Hesum greiddi stjórin fyri P/F Smyril-Line frá.

Fíggjarnevndin hevur í dag viðgjørt málið og býtt seg í tríggjar minnilutar.

Minnilutin (Ivan Johannesen, Sv. Åge Ellefsen og Øssur Dam Jacobsen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins, tó at tann treyt, sum sett er í § 1, 2. stk. fyri veðhaldið, um at felagið útvegar í minsta lagi kr. 1.350.000,- afturat í láni, eigur at verða broytt soleiðis at skoytt verður uppí, at hetta kann verða og/ella partapeningur; somuleiðis skal kravið um afturgjaldingina av hesum láni broytast soleiðis, at tað ikki má kunna verða afturgoldið eftir stytri tíð enn afturgjaldstíðin fyri tað landskassaveðhildna lánið.

Sami minniluti mælir landsstýrinum til, at áðrenn veðhald verður veitt, skal landsstýrið treyta sær, at leiðsla felagsins, áðrenn summarsiglingin 1984 er komin at enda, skal samráðast við landsstýrið og útvega sær landsstýrisins og fíggjarnevndarinnar góðkenning av felagsins virksemi í vetrarhálvárinum 1984/85.

Sostatt setir nevndi minniluti fram soljóðandi

**broytingaruppskot**
**til**
**uppskot landsstýrisins**

§ 1, stk. 2 verður orðað soleiðis:
»Treyt fyri veðhaldinum er, at felagið útvegar í minsta lagi 1.350.000 kr. aftrat í láni og/ella partapeningi. Lánið má ikki kunna verða afturgoldið eftir stytri tíð enn afturgjaldingartíðin galdandi fyri tað lánið, landskassin veðheldur fyri.«

§ 1, stk. 2 formuleres således:
»Det er en betingelse for garantien, at selskabet fremskaffer yderligere et lån på mindst 1.350.000 kr. og/eller i aktiekapital. Lånet skal ikke kunne tilbagebetales på kortere tid end den tilbagebetalingstid, der er gældende for det lån, som landskassen garanterer for.«

Minnilutin (Jørgen Thomsen og Ove Mikkelsen) førir fram:

Við heimild í løgtingslógunum, sum vórðu samtyktar í løgtingsmálunum nr. 51 og 123/1983 hevur landskassin goldið kr. 2.760.000,00 í partapeningi í P/F Smyril-Line.

Felagið hevur nú søkt landsstýrið um veðhald fyri einum kreppuláni uppá 12 mió. kr. Við løgtingsmáli nr. 46/1983: Veðhald fyri táni

til P/F Smyril-Line, hevur landsstýrið lagt málið fyri tingið í dag. Í viðmerkingunum til uppskotið sigur landsstýrið m.a.:

»Landsstýrið heldur, at felagið átti at ráðført seg við landsstýrið, sum vegna landskassan hevur bundið seg við so nógvum peningi í hetta felag, áðrenn tað fór undir at broyta so munandi tær ætlanir, sum tað legði fram, tá tilsøgnin um partapening og veðhald lógu fyri.«

Í hesum sambandi vil minnilutin vísa á, at landsstýrið ikki hevur valt umboð í nevndina fyri P/F Smyril-Line og harvið hevur landsstýrið ikki tryggjað tí almenna innlit og ávirkan í mun til almenna partapeningin. Hetta verður harðliga átalað. Minnilutin heldur tað vera ábyrgdarleyst út um alt sømuligt mark, at landstýrið ikki hevur tryggjað alment innlit og almenna ávirkan fyri tann pening, sum tað almenna hevur sett í felagið.

Minnilutin metir tað at vera eina sjálvsagda fyritreyt fyri framhaldandi almennum stuðuli, at tað almenna fær umboð í nevndina fyri Smyril-Line í mun til almenna partapeningin, soleiðis at tí almenna verður tryggjað innlit og ávirkan í mun til tann pening, sum skattaborgarin hevur sett í hetta felag. Javnaðarflokkurin og tjóðveldisflokkurin loyva sær at seta fram uppskot samsvarandi hesum.

Javnaðarflokkurin og tjóðveldisflokkurin halda, at viðgerðin, hetta mál fær, sammett við ta viðgerð, Smyril fekk, tá hann var í vetrarsigling í 1980/81, er rættuliga margháttlig.

Minnilutin heldur at millumlandasiglingin eigur at halda fram. Henda sigling kann geva arbeiði til eini 150-200 fólk. Eisini má haldast, at henda sigling kann geva eitt positivt íkast til okkara samfelagsbúskap. Minnilutin vil medvirka til at finna loysn, sum kann tryggja framhaldandi millumlandasigling.

Umboðini fyri javnaðarflokkin og tjóðveldisflokkin kunnu ikki taka undir við landsstýrisins uppskoti í hesum máli. Í viðmerkingunum til uppskotið sigur landsstýrið, at tað, sum veðhaldari longu nú hevur lagt út í falnum rentum 1,2 mió. kr. Minnilutin mælir til, at henda upphædd saman við 2,8 mió. kr. ella tilsamans 4 mió. kr. verður sett í Smyril-Line sum almennur partapeningur.

Síðani mælir minnilutin til, at landsstýrinum verður heimilað at veðhalda fyri einum kreppuláni uppá 8 mió. kr. Um kreppulánið ikki er afturgoldið í seinasta lagi 1. januar 1985, heldur minnilutin, at hetta lán eigur at ganga inn sum almennur partapeningur í P/F Smyril-Line.

Út frá hesum viðmerkingum seta javnaðarflokkurin og tjóðveldisflokkurin í staðin fyri uppskot landsstýrisins fram soljóðandi

**lógaruppskot**

**§ 1.** Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at seta 4 mió. kr í partapeningi í P/f Smyril-Line.

**§ 2.** Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri einum láni upp til 8 mió. kr. til P/f Smyril-Line.
*2. stk.* Treyt fyri veðhaldinum er, at felagið útvegar í minsta lagi 800.000 kr. afturat í eginpeningi. Lánið má ikki vera afturgoldið eftir styttri tíð enn afturgjaldingartíðin galdandi fyri lánið, landskassin veðheldur fyri.
*3 stk.* Er lánið, sum landskassin veðheldur fyri sambært § 2, stk. 1 ikki afturgoldið í seinasta lagi 1. januar 1985, gongur peningurin inn sum almennur partapeningur í P/f Smyril-Line.

**§ 3.** Treytin fyri almenna partapeninginum í P/f Smyril-Line er, at landsstýrið velur umboð í nevndina fyri P/f Smyril-Line fimun til almenna partapeningin.

**§ 4.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**§ 1.** Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at tegne aktier for 4 mio. kr. i P/f Smyril-Line.

**§ 2.** Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et lån på op til 8 mio. kr. til P/f Smyril-line.
*Stk. 2.* Det er en betingelse for garantien, at selskabet fremskaffer mindst kr. 800.000,- yderligere i egenkapital. Lånet må ikke være tilbagebetalt efter kortere tid end tilbagebetalingstiden, der gælder for det lån, landskassen garanterer for.
*Stk. 3.* Såfremt lånet, som landskassen garanterer for i henhold til § 2, stk. 1, ikke er tilbagebetalt senest 1. januar 1985, konverteres beløbet til offentlig aktiekapital i P/f Smyril-Line.

**§ 3.** Betingelsen for, at der indskydes offentlig aktiekapital i P/f Smyril-Line er, at landsstyret indvælger repræsentant(er) i bestyrelsen for P/f Smyril-Line i forhold til den offentlige aktiekapital.

**§ 4.** Denne lov træder i kraft straks.

Eisini seta Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin fram soljóðandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Vísir grannskoðaður roknskapur fyri farleiðina Korsør-Kiel hjá Smyril-Line ikki munandi framgongd frá 1. januar til 1. september 1984, verður spurningurin um framhald av hesi farleið at leggja fyri løgtingið áðrenn »Norrøna« fer aftur í vetrarsigling.

Føroya Løgting tekur tá støðu til, um Smyril-Line skal halda á við hesi sigling ella ikki.

Minnilutin (Asbjørn Jacnsen og Adolf V. Hansen) metir tað sera óheppið at lóggeva um kreppulán til einstøk vinnutól, uttan at neyðugur eginpeningur skal útvegast eins og fyri onnur vinnutól.

Her kann verða vist á, at fiskavirki skulu útvega 10% í eginpeningi og 15% í øðrum lánum/veðhaldum.

Er talan um fiskiskip, har partafelag er eigari, skal felagið útvega 10% í eginpeningi, og har einstaklingur er eigari, skal harumframt inngjaldast spardur skattur fyri seinastu 2 árini.

Minnilutin heldur eisini, at tað er sera óheppið, at landsstýrið, sum eigur um 27% av goldna partapeninginum, ongan nevndarlim hevur.

Tað eigur tí at vera ein treyt, at landsstýrið sum skjótast fær ein lim innvaldan í nevndina.

Minnilutin setir fram soljóðandi

**broytingaruppskot**
**til**
**uppskot landsstýrisins**

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri einum láni upp til 90% av kr. 13.350.000,- til P/f Smyril-Line.

*2. stk.* Treytin fyri veðhaldinum er, at eginpeningurin verður hækkaður í samsvar við prinsippið í § 2 II b) í løgtingslóg nr.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån på op til 90% af kr. 13.350.000,- til P/f Smyril-Line.

*Stk. 2.* Betingelsen for garantien er, at egenkapitalen forhøjes i overensstemmelse med prinsippet i § 2 II b) i lagtingslov nr. 66

66 frá 30. juni 1983 um vehald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir við 10% av lánsupphæddini.

*3. stk.* Tann av Føroya Landsstýri útlagdi peningur verður at gjalda aftur av ti í § 1, stk. 1 játtaðu upphædd.

§ 2. Henda lóg fær gildi beinan vegin.

af 30. juni 1983 om garanti for lån til fiskerskibe og fiskerivirksomheder med 10% af lånebeløbet.

*Stk. 3.* Det af Færøernes Landsstyre erlagte beløb skal tilbagebetales af det i § 1, stk. 1 nævnte beløb.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

---

2. viðgerð á seinni fundi sama dag. Uppskot landsstýrisins fall við 16 ja-atkvøðum, 15 atkvøddu ikki, 1 var burturstaddur. Atkvøtt varð við navnakalli.

Ja atkvøddu: Flemming Mikkelsen, Adolf Hansen, Ove Mikkelsen, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen, Arne Ziskasen, Poul Mikkelsen, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Olaf Olsen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Jacob Lamhauge, Dánjal P. Dalbø, Eli Nolsøe, Jógvan Sundstein.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Jacob Lindenskov, Atli Dam, Pauli Ellefsen.

Burturstaddur: Juul Jacobsen.

Lógaruppskotið frá Tjóðveldisflokkinum og Javnaðarflokkinum § 1 fall við 13 0.

Lógaruppskotið frá Adolf Hansen og Asbjørn Joensen fall við 9 ja-atkvøðum, 22 atkvøddu ikki, 1 var burturstaddur.

Atkvøtt varð við navnakalli.

Ja atkvøddu: Hilmar Kass, Asbjørn Joensen, Fredrik Olsen, Ove Mikkelsen, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Jacob Lindenskov, Atli Dam, Erlendur Patursson, Arne

Ziskasen, Poul Mikkelsen, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Olaf Olsen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Jacob Lamhauge, Dánjal P. Dalbø, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein.

Burturstaddur: Juul Jacobsen.

Hilmar Kass mælti til at beina málið aftur í nevnd. Atkvøtt varð um, at málið ikki skuldi aftur í nevnd. Hetta varð samtykt við 18-0 atkvøðum.

Broytingaruppskot frá Ivan Johannesen, Øssi Dam Jacobsen og Svend Åge Ellefsen fall við 15-0 atkvøðum.

F.L.j.nr.1822-13.

---

# 47. Biograflóg og filmseftirlitslóg.

Ár 1984, mikudagin 8. februar legði Páll Vang, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja tey í viðlagda áliti framsettu uppskot til

1) løgtingslóg um biografar, og
2) løgtingslóg um filmseftirlit.

**Viðmerkingar:**

Í november 1981 setti landsstýrið eina nevnd at kanna biograf-viðurskiftini og seta fram uppskot til nýggja lóg um biografar, ti

mett var, at galdandi lóg um biografviðurskifti frá 1938 ikki var tíðarhóskandi longur.

Nevndin hevur latið landsstýrinum álit við frágreiðing og uppskotum til løgtingslógir um biografar og filmseftirlit.

Við í lógaruppskotinum til filmseftirlit hevur nevndin eisini tikið reglur um eftirlit við útleigan og sølu av videofilmum, samsvarandi løgtingssamtykt í tingmáli nr. 75/1982.

Landsstýrið tekur undir við uppskotinum frá nevndini og leggur fram uppskot til lógir um biografar og filmseftirlit vísandi til uppskotini í nevndarálitinum.

Sí skjal 10.

1. viðgerð 10. februar. Eftir atkvøðugreiðslu um at beina málið í eina mentunarnevnd, sum fall við 12-0, varð málið beint í lóganevndina, sum 8. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av landsstýrinum 8. februar 1984 og undir 1. viðgerð 10. í s.m. beint í lóganevndina.

Lóganevndin hevur viðgjørt málið, men við tað at hetta er eitt stórt og rúgvusmikið mál, sær nevndin seg ikki føra fyri at avgreiða málið eftir so stuttari tíð, og nælir nevndin til, at lóganevndin heldur fram sum millumtinganevnd hesum máli viðvíkjandi og setir sostatt fram

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Lóganevndin heldur fram sum millumtinganevnd til ólavsøkutingsetuna til viðgerð av løgtingsmáli nr. 47/1983: Biograflóg og filmseftirlitslóg.

2. viðgerð 9. mai. Oppskotið til samtyktar frá nevndini samtykt við 26-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 513-18-2.

# 48. Nýtt veðhald fyri rakstrarláni til p/f Smyril-Line.

Ár 1984, mikudagin 8. februar legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um veðhald fyri rakstrarláni til P/f Smyril-Line.**

**§ 1.** landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri einum láni upp til 13,2 mió. kr. til p/f Smyril-Line.
*2. stk.* Treyt fyri veðhaldinum er, at felagið útvegar í minsta lagi kr. 1.460.000 afturat í láni og/ella partapeningi. Lánið má ikki gjaldast aftur fyrr enn lánið, landskassin veðheldur fyri, er aftur goldið.

**§ 2.** Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

**Lagtinglov om garanti for driftslån til p/f Smyril-Line.**

**§ 1.** Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et lån opp til 13,2 mio. kr. til p/f Smyril-Line.
*Stk. 2.* Det er en betingelse for garantien, at selskabet fremskaffer yderligere et lån og/eller aktiekapital på mindst kr. 1.460.000. Lånet må ikke tilbagebetales førend det lån, som landskassen garanterer for, er tilbagebetalt.
**§ 2.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Í tingmáli nr. 46/1983: Veðhald fyri láni til P/f Smyril-Line er bæði av landsstýrinum sum uppskotsstillara og í álitinum frá fíggjarnevndini givnar upplýsingar um málið eins og greitt er frá ymiskum viðmerkingum og sjónarmiðum. Vist verður til til viðmerkingarnar í hesum máli. Uppskotið umfatar eina veðhaldsupphædd upp á 13,2 mió. kr., ella 1,2 mió. kr. meira enn skotið er upp í tingmáli nr. 46/Orsokin

til hetta er, at tikið er við eitt útlegg upp á ca 1,2 mió. kr., sum landskassin hevur lagt út fyri felagið. Ein treyt fyri tí uppskotna veðhaldinum er tí, at hetta útlegg verður afturgoldið av nýggja láninum, og syrgir landsstýrið fyri hesum.

Eisini vil landsstýrið skipa so fyri, at tað fær umboðan í nevnd felagsins.

Landsstýrið hevur fingið trygd fyri, at teknaður ikki goldin partapeningur verður innkravdur til gjaldingar til ásetta tíð. Eisini fyriliggur váttan frá nevndarlimum felagsins og øðrum um at manglandi partapeningur verður teknaður og inngoldin.

Landsstýrið vil, áðrenn veðhaldið verður veitt, treyta sær, at leiðsla felagsins, áðrenn 1. september 1984 skal samráðast við landsstýrið og útvega sær landsstýrisins og fíggjarnevndarinnar góðkenning av felagsins virksemi í vetrarhálvárinum 1984/85.

1. viðgerð á seinri fundi sama dag. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum sama dag legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 8. februar 1984 undir 1. viðgerð sama dag beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Svend Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen, Asbjørn Joensen, Ove Mikkelsen og Adolf V. Hansen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Ivan Johannesen) kann ikki taka undir við orðingini í stk. 2 í § 1 í uppskoti landsstýrisins og setir fram soljóðandi

**broytingaruppskot**
**til**
**uppskot landsstýrisins**

§ 1, stk. 2 verður orðað soleiðis:

»Treyt fyri veðhaldinum er, at felagið útvegar í minsta lagi 1.460.000 kr. aftrat í láni og/ella partapeningi. Lánið má

»Det er en betingelse for garantien, at selskabet fremskaffer et yderligere lån på mindst 1.460.000 kr. og/eller i kapital.

ikki kunna verða afturgoldið eftir stytri tíð enn afturgjaldingartíðin galdandi fyri tað láni, landskassin veðheldur fyri.«

Lånet skal ikke kunne tilbagebetales på kortere tid end den tilbagebetalingstid, der er gældende for det lån, som landskassen garanterer for.«

Sami minniluti tilskilar hesa støðu:

Landsstýrið treytar sær, at nevnd felagsins, sum verður at veðhalda fyri láninum 1.460.000 kr., so hvørt, hon verður loyst frá veðhaldinum, gevur seg undir, at landsstýrið fær regress móti nevndini fyri tilsvarandi upphædd, sum er goldin av láninum 1.460.000 kr., og at regresskravið stendur við, til lánið 13.200.000 kr. er afturgoldið.

Minnilutin (Atli Dam) viðmerkir:

Javnaðarfloksins prinsipiella støða í siglingarmálinum er, at tí almenna skuldi verið loyvt at hildið fram við teirri uttanlandssigling, sett varð í verk í 1975, ella at uttanlandssiglingin í minsta lagi helt fram í samarbeiði á jøvnum føti millum almennan og privatan partapening.

Út frá hesum hevur flokkurin ferð eftir ferð mælt til, at hitt almenna setti munandi pening í felagið, soleiðis at felagnum varð tryggjaður frægasti rakstur, og tí almenna varð veitt rímiligt innlit og ávirkan, so sum nátttúrligt er, tá hugsað er um, at almenn skattaborgaraveðhald skulu verða grundstøði undir rakstrinum eina langa tíð.

Felagið søkti landsstýrið um at útvega 40% av partapeninginum, men sýtti samgongan fyri hesum, og varð sum kunnugt úrslitið, at landskassin setti í 20% av eginpeninginum. Hesin partur er síðani vaksin til 27% av tí, at samanlagt eru fyribils bert inngoldnar góðar 10 mió. kr. í partapeningi.

Fyri hendan partapening hevur landsstýrið ikki valt umboð í nevnd felagsins, og er tí ikki løgið, at tiltakið til at hjálpa felagnum í likviditetskreppuni, íkomin er, kemur so seint í lag.

Vitandi at partar av samgonguni hava stóran mótvilja ímóti ov nógvum almennum partapeningi — hóast munabesta hjálpin lá í hesum, so sum felagið eisini sjálvt hevur mett í umbøn sini við 40% — er Javnaðarflokkurin til reiðar at minka tilmæltu upphæddina í uppskoti nr. 46 upp á 4 mió. kr. í almennum partapeningi niður í 1,2 mió. kr., sum verða útvegaðir [illegible], at útlegg landskassans verða »konverterað« til partapening.

Orsøkin til, at javnaðarflokkurin í hesum føri slakar so nógv frá prinsipiellu støðu síni, er, at hann metir uttanlandssiglingina so týdningarmikla, at hon undir ongum umstøðum má steðga, og flokkurin tí vil rætta borgarliga meirilutanum — sum í stríðnum við seg sjálvan hevur mist evnini til at skera ígjøgnum við eini loysn — eina hond, sum hann kann nýta til at fáa eina góða fyribilsloysn.

Javnaðarflokkurin hevur framvegis álit á, at í skilagóðum samarbeiði millum hitt almenna og privatar kreftir kann ferðamanna- og farmasigling á øllum høvum gerast ein týdningarmikil táttur í búskapi føroyinga — og serliga munagott kann hesin táttur medvirka til at útvega neyðugt tal av arbeiðsplássum til føroyingar.

Minnilutin setir sostatt fram soljóðandi lógaruppskot hesum viðvíkjandi:

**§ 1.** Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri einum láni upp til 10 mio. kr. til p/f Smyril-Line.
*2. stk.* Treyt fyri veðhaldinum er, at felagið útvegar í minsta lagi kr. 1.400.000 aftrat í partapeningi, og at veðhaldsútlegg landskassans upp á kr. 1.200.000 verða upptikin sum partapeningur í felagnum. Lánið, felagið útvegar má ikki gjaldast aftur, fyrr enn lánið, landskassin veðheldur fyri, er afturgoldið.

**§ 2.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**§ 2.** Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et lån op til 10 mio. kr. til p/f Smyril-Line.
*Stk. 2.* Det er en betingelse for garantien, at selskabet fremskaffer mindst kr. 1.400.000 yderligere i aktiekapital, og at det beløb, som landsstyret som garant har betalt på kr. 1.200.000 indskydes i selskabet som aktiekapital. Lånet, som selskabet fremskaffer, må ikke tilbagebetales før end det landskassegaranterede lån er tilbagebetalt.

**§ 2.** Denne lov træder i kraft straks.

2. viðger sama dag á seinri fundi. Uppskot landsstýrisins § 1 samtykt við 22-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. At fara til 3. viðgerð soleiðis samtykt við 23-0.

Lógaruppskotið frá Javaðarflokkinum § 1 fall við 9 ja-atkvøðum, 1 nei-atkvøðu og 22 atkvøddu ikki. Atkvøtt varð við navnakalli.
**Ja atkvøddu:** Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur

Mohr Olsen, Hilmar Beck, Jørgen Thomsen, Jacob Lindenskov, Atli Dam, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen.

Nei atkvøddu: Adolf V. Hansen.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Juul Jacobsen, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Hans M. Joensen, Arne Ziskasen, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Olaf Olsen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Jacob Lamhauge, Dánjal P. Dalbo, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein.

Broytingaruppskot til § 1, 2. stk., frá minniluta (Ivan Johannesen) fall við 8-0 atkvøðum.

3. viðgerð sama dag. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

F.l.,j.nr. 1822-13. Lóg nr. 18 frá 23. februar 1984.

---

# 49. Endurfígging av lánum til landskassans og ávísar landsstovnar.

Ár 1984, mikudagin 8. februar legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um endurfígging av lánum til landskassan og landsstovuar.**

**§ 1.** Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka upp lán í krónum og/ella útlendskum gjaldoyra til endurfígging av verandi lánum.
*2. stk.* Telefonverki Føroya Løgtings, Húsalánsgrunninum, Føroya Ídnaðargrunni og Menningargrunni Ídnaðarins verður heimilað at taka upp lán í krónum og/ella útlendskum gjaldoyra til endurfígging av verandi lánum.

**§ 2.** Henda heimild røkkur ikki longri enn til upptøku av nýggjum lánum svarandi til upphæddina av gomlu lánum, tikin við landskassaveðhaldi.

**§ 3.** Landsstýrinum verður heimilað við góðkenning fíggjarnevndarinnar landskassans vegna at veðhalda fyri upptøku av teim í § 1, 2. stk. nevndu lánum.

**§ 4.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om refinansiering af lån til landskassen og landsinstitutioner.**

**§ 1.** Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån i kroner og/eller udenlandsk valuta til refinansiering af bestående lån.
*Stk. 2.* Telefonverk Føroya Løgtings, Boligfonden, Færøernes Industrifond og Industriudviklingsfonden bemyndiges til at optage lån i kroner og/eller udenlandsk valuta til refinansiering af bestående lån.

**§ 2.** Denne hjemmel gælder kun til optagelse af nye lån svarende til lånebeløbet af tidligere optagne lån, optaget med landskassegaranti.

**§ 3.** Landsstyret bemyndiges til efter godkendelse af finansudvalget på landskassens vegne at garantere for optagelse af de i § 1, stk. 2 nævnte lån.

**§ 4.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Fyriliggjandi uppskot snýr seg um loyvi til heimild at skifta um verandi lán til tess at betra um afturgjaldstreytirnar.

Reglur, sum tær, ið her verða skotnar upp, eru valigar í øðrum londum. I Danmark fær figgjarmálaráðharrin heimild samkvæmt serlóg, bæði til upptøku av nýggjum lánum og til umskiftan av verandi lánum.

Gongdin á lánimarknaðinum í Danmark og uttanlands annars ger tað ynskiligt, at landsstýrið saman við figgjarnevndini og landsstovnarnir fáa eina lógarheimild sum fyriliggjandi uppskot.

1. viðgerð sama dag á seinri fundi. Frávik í tíðarfreistini varð givið við 19-0 atkvøðum. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 10. februar legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 8. februar 1984 og undir 1. viðgerð sama dag beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 9. februar 1984 og býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Atli P. Dam, Sv. Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) tekur ikki undir við málinum og við merkir:

Í prinsippinum tekur tjóðveldisflokkurin undir við tankanum, men flokkurin hevur ikki álit á sitandi landsstýri at lata tí slíka fullmakt.

Hetta mál hevur ligið hjá landsstyrinum í longri tíð enn flest onnur mál — større og smærri, ádrenn tey eins og hetta mál blíva á seinasta degi løgd fyri løgtingið ella figgjarnevndina.

Øll hesi mál eru eftir tjóðveldisflokksins metan alt ov leið uppi og tørva neyðug skjøl, so løgting og figgjarnevnd ikki í tíð og nógv upplýsingar til nágreiniliga at viðgera málið. Hetta hevur altíð verið álagað. Hetta er einki undantak fyri hetta higgað, og tí vegna kann minnilutin vegna tørvandi upplýsingar ikki viðsetta málið í dag; sostatt kann tjóðveldisflokkurin ikki taka undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Adolf Hansen) er av teirri áskoðan, at tað skal vera ein treyt at endurfiggja eftir hesi lóg, at lánsuppheldin verður minkað við 10% og setir sostatt fram soljóðandi

**broytingaruppskot**
**til**
**uppskot landsstýrisins**

Sum § 1, 3. stk. verður sett:
»Treytin fyri at endurfíggja eftir hesi lóg er, at lánsupphæddin minkar við 10%«.

Som § 1, stk. 3 indsættes:
»Betingelsen for at der kan refinansieres i henhold til denne lov er, at lånebeløbet formindskes med 10%.«

2. viðgerð 10. februar. Uppskot landsstýrisins § 1 samtykt við 20-0, §§ 2-4 samtyktar við 20-0. Málið soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð við 20-0. Broytingaruppskotið til § 1, 3. stk., frá minnilutanum (Adolf V. Hansen) fall við 3-0 atkvøðum.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Málið soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 19-1 atkvøðum.

F.L.j.nr. 440-57. Lóg nr. 15 frá 10. februar 1984.

---

# 50. Trygdarbelti í bili.

Ár 1984, fríggjadagin 10. februar legði Karin Kjølbro, løgtingslimur, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum at seta eina nevnd at smíða eina lóg um trygdarbelti í bili.

Álitið verður lagt fyri tingið í hesi tingsetu.

**Viðmerkingar:**
Ferðsluvanlukkur og ferðsludráp hava seinastu árini verið álvarsamur samfelagsspurningur í landi okkara.

Meðan grannalond okkara síðani 1970 hava megnað at fáa talið á fólki, ið lata lív í ferðsluni niður við millum 40 og 50%, so er støðan júst hin øvugta í Føroyum.

Í 5-áraskeiðnum 1968-72 lótu 14 fólk lív í Føroyum. Í 5-ára skeiðnum 1978-82 lótu 33 fólk lív í ferðsluni í Føroyum. Tølini á skrásettum motorakførum eru í sama tíðarskeiði ávikavist 3.800 og 11.800. (Kelda: landslæknin).

Ti samanetingar kann nevnast, at í 1970 doyðu 1055 fólk í ferðsluni í Finlasndi. Í 1981 var talið 555. Í Danmark eru tølini fyri somu ár ávikavist 1208 og 662 (Kelda: Vi i Norden).

Orsøkirnar til hetta verða í grannalondunum mettar at vera ymiskar, men fólk tykjast sum heild at vera samd um, at lógásetta skyldan at brúka trygdarbelti í bili hevur sín avgerandi leiklut í hesi positivu vend.

Í øllum grannalondum okkara eins og í Onglandi er tað við lóg álagt fólki at brúka trygdarbelti, tá tey koyra. Talan hevur verið um bilføraran og síðufólkið. Nú eru fólk í hesum londum farin undir at umhugsa lógásett krøv um trygdarbelti á baksetrum eisini. Tilfarið í grannalondum okkara er lætt at fáa hendur á, so tað átti at verið yvirkomiligt eftir stuttari tíð at lata úr hondum eitt hóskandi lógaruppskot.

Ein meinbogi aftrat er, at vit í summum førum flyta inn bilar, ið ikki hava trygdarbelti í, og at landsmenn okkara fara av landinum við slíkum akførum. Bøtur fáa tey tó ikki, tí bilur teirra kemur úr landi uttan slíka lóg.

Hetta brek áttu vit at kunna avgreitt beinanvegin og bera tað so í bandi, at ikki verður loyvt at innflyta bilar uttan at trygdarbelti eru í.

1. viðgerð 15. februar. Málið varð beint í lóganevndina, sum 8. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 10. februar og undir 1. viðgerð tann 15. í s.m. beint í lóganevndina.

Í uppskotinum verður mælt til at seta ... nevnd til at samtøka ... lóg um trygdarbelti í bili

Lóganevndin hevur á fundi 3. mai viðgjørt málið, og fyri at fáa hendan álvaraspurning loystan sum best, hevur nevndin umrøtt spurningin saman við Høgna Debes Joensen, landslækna og Óla Mikkelsen yvirlækna og málið er sent ránum fyri ferðslutrygd til ummælis.

Undir umrøðuni vísti læknin til statistiskt tilfar og samráðingar um hendan spurning uttanlands, og er niðurstøðan hon, at tað er av størsta týdningi fyri at minka um ferðsludeyða og varandi mein av ferðsluvanlukku, at trygdarbelti verður nýtt.

Tað var ásannað, at vit her heima ikki hava nakað verunligt tilfar at byggja eina støðutøku á, men varð mett, at tað ikki var ráðiligt at bíða eftir, at slík kanning var at enda komin, ti hetta kann taka drúgva tíð og varð tilfarið til kanningina avmarkað.

Víst varð á, at í einum tíðarskeiði frá 1953-83 doyðu 95 fólk í ferðsluni, og vóru 51% av hesum undir 20 ár.

Ferðslunevndin boðar frá, at henda longu hevur sent landsstýrinum tilmæli um trygdarbelti sum útgerð í bilar, eins og ráðið fer undir arbeiðið fyri at fáa øll at nýta trygdarbelti.

Rúgvusmikið tilfar varð fingið til vega frá landslæknanum, sum er av stórum týdningi sum grundgeving, og skilabesta loysnin á málinum, og verður hetta hjálagt sent landsstýrinum.

Nevndin heldur, at hetta týdningarmikla mál eigur at finna eina loysn, og vísir á teir bólkar, ið arbeiða við spurninginum um ferðslutrygd, tað veri seg ráðið sjálvt og áhugabólkar av læknum, sum arbeiða við spurninginum um orsøkir v.m., verða tiknir við í ráðum, tá lóg hesum viðvíkjandi verður smíðað sum allarfyrst.

Vísandi til frammanfyri standandi setir nevndin fram fylgjandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at kanna spurningin um trygdarbelti í bilum og gera neyðugar lógarreglur.

2. viðgerð 8. mai. Uppskotið til samtyktar samtykt við 20-0 at kvøðum.

F.L.j.nr. 514-5-6

# 51. Veðhald fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu.

Ár 1984, mikudagin 15. februar legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu.**

§ 1. Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1984/85 at veita veðhald fyri lánum til fiskamjøl, lýsi, matsild, úrdráttir av svartkjafti og agn á goymslu. Veðhaldið verður givið fyri lánum ikki upp um 70% av lánsvirðinum.

§ 2. Hendan lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om garanti for lån til fiskemel og animalsk olie m.v. på lager.**

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansåret 1984/85 at garantere for lån til fiskemel, animalsk olie, konsumsild, produkter af blåhvilling og agn på lager. Garantien ydes for lån, der ikke må overstige 70% af låneværdien.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Vist verður til viðmerkingar frá landsstýrinum í løgtingsmáli nr. 54/1975, løgtingstíðindi 1975, bls. 231.

1. viðgerð 17. februar. Málið varð uttan nevndarviðgerð beint til 2. viðgerð.

2. viðgerð 21. februar. § 1 samtykt við 23-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð. Uppskotið endaliga samtykt við 20-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1408-5-2. Lóg nr. 33 frá 3. mai 1984.

# 52. Uppskot til samtyktar viðvíkjandi føroyskum-donskum fíggjar-viðurskiftum.

Ár 1984, mikudagin 15. februar legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður, vegna Fjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið velur seks manna millumtinganevnd, ein lim úr hvørjum tingflokki, við teirri uppgávu at gera uppskot um nýskipan í fíggjarviðurskiftum Føroya og Danmarkar, soleiðis at núverandi nongu donsku fíggjarveitingar verða umbýttar við eina heildarveiting, ið síðan minkar, so hvørt sum ræði løgtings og landsstýris yvir føroyskum viðurskiftum veksur.

**Greinagerð:**
Í tingsetuni 1981 legði fjóðveldisflokkurin fram uppskot til samtyktar við sama innihaldi sum hetta uppskot, ið nú verður lagt fyri tingið. Men uppskotið fekst ikki samtykt tá.

Orsøkirnar til, at uppskotið nú kemur fram aftur, er í fyrsta lagi tann, at ávsin flokkur, ið tá var í móti hesum uppskoti, nú sýnist vilja taka undir við tí, í øðrum lagi tann, at løgtingið hevur samtykt at áleggja landsstýrinum at bera so í bandi, at Føroyar gerast fíggjarliga sjálvbjargnar og í triðja lagi, at tað síðan eru fingin gjølligari prógv fyri hvussu ólagalig núverandi fíggjarskipan okkara er.

— — —

Tey tøl, ið her verða nevnd, eru fingin burtur úr danska ríkisroknskapinum, soleiðis sum tey eru lýst í seinastu ársfrágreiðing. Tey eru frá seinasta atkomiliga ári, nevniliga 1981. Nú vita vit, at tølini eru

hækkað nakað síðan tá, men nýggjari tøl fingust so ikki, og annars er at viðmerkja, at heildarmyndin er lítið ella als ikki broytt nakað munandi síðani tá, og serstakliga er at nevna, at tey lutfallstøl, ið her verða nevnd, mugu vera mest sum tey somu sum tey vóru fyri árið 1981.

Árið 1981 vóru samanlagdar peningaveitingar danska ríkiskassans til Føroya 481,6 mió. kr.

Av hesum gingu 99,5 mió. kr. til okkum óviðkomandi og óynskt endamál: ríkisumboðið 3,4 mió., verjuskipini 66,6 mió., marinustøðin 6,5 mió. og flyvestation Thorshavn (Mjørkadalur og Eiðisstøðin) 23,0 mió. kr. Hesa seinastu upphædd, 23,0 mió. kr. fær danski ríkiskassin endurgoldna frá NATO og USA.

Draga vit hesar 99,5 mió. frá teimum 481,6 mió., verða eftir 382,1 mió. kr., ið kunnu skuldskrivast okkum.

Av hesum eru størstu upphæddirnar til hesi endamál:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Heilsumál | 82,1 | mió. | kr. |
| Skúlamál | 101,4 | - | - |
| Almannamál | 149,5 | - | - |
| Samantalt | 333,0 | mió. | kr., sum eru 87,1% av samantaldum útreiðslum. |

Samanlagdar útreiðslur, 382,1 mió. kr., býtast í umsitingar- og íløgu-útreiðslur soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Umsiting | 363,7 | mió. kr. | 95,2% |
| Íløgur | 18,4 | - - | 4,8% |
| | 382,1 | mió. kr. | 100,00% |

Her er í fyrsta lagi at viðmerkja, at av teimum samanløgdu 481,6 mió. kr. eru — sum longu nevnt — 99,5 mió. kr., ið ganga til okkum óviðkomandi og óynskt endamál, og at har í millum eru 23,0 mió. kr., ið danski ríkiskassin fær endurgoldið frá NATO og USA.

Í øðrum lagi síggja vit, at av teimum 382,1 mió. kr. ganga bert 18,4 mió. kr., ella 4,8%, til íløgur, meðan nógv tað mesta, 363,7 mió. kr., ella 95,2%, ganga til umsitingar ella rakstrarútreiðslur. Nógv tað mesta av hesum gongur so til tey 3 endamálini, heilsumál, skúlamál og almannamál, og tað nógva av hesum eru so aftur lønarútreiðslur og sosialar veitingar.

Hetta er heilt einastandandi skipan. So illa land okkara var fyrikomið undir aldalangari/danskari fyristøðu, hevði tað ikki verið meir enn sjálvsagt, at danski ríkiskassin veitti okkum stuðul til at koma

upp undan. Vit kundu uttan at skammmast tikið móti slíkum stuðuli, t.e. *hjálp til sjálvhjálp*. Hetta er tað, ið tey ríku framkomnu londini royna móti teimum fátæku og líttið á leið komnu londunum. Her hjá okkum er hetta beint tvørtur ímóti. Bert ein heilt lítil partur av øllum teimum donsku peningaveitingunum til Føroya, 4,8%, gongur til endamál, ið hava varandi virði, t.e. til fløgur, meðan nógv tað mesta, 95,2%, gongur til umsiting og rakstur. Av hesum gongur so aftur nógv tað mesta til lønir og sosialar veitingar, ið aftur ganga til dagliga nýtslu — mat, drykk og klæði. Hetta er tí eingin menningarhjálp, eingin hjálp til sjálvhjálp, men kann nógv heldur samanberast við Reyða Kross hjálp, Neyðhjálp fólkakirkjunnar o.t.

LANDI okkara er tí eingin varandi bati í øllum hesum peningi. Og hvar endar so hesin peningur? Ja, tað nógva av honum fer í handlarnar her — og endar so hjá heilsølumonnunum í Keypmannahavn.

Teir, sum bera byrðarnar av hesi rangvørgu skipan, eru teir donsku skattgjaldarar, lønarfólkið fyrst og fremst, umframt fátækir fólkapensjónistar.

Nú verður sagt, at tey, sum í Føroyum njóta gott av hesi skipan, eru tey sjúku, pensjónistarnir, børnini. Men hetta er rong og følsk tala. Teir, sum her í Føroyum skúma róman av hesi skipan, eru aftur í móti tey ríku, sum annað hvørt við okkara rongu skattaskipan ella uttan um skattalógina sníkja seg undan sjálvsøgdum skyldum móti okkara sjúku, móti okkara børnum, móti teimum gomlu og avlamnu — og blaka alt hetta yvir á sakleysar danskar skattgjaldarar.

SAMAM UM TIKIÐ er tí henda dansk-føroyska peningaskipan virðisleys sum varandi stuðul, hon er eingin hjálp til sjálvhjálp, og hon er ósømilig, ómoralsk.

Tað er ymist annað, sum vert er at nevna, tá ið vit tosa um donsk-føroysk viðurskifti, m.a. hetta:

Av samanløgdum útflutningi okkara ganga o.u. 200 mió. kr til Danmarkar — sum er o.u. 1/6 av heildarútflutninginum. Av innflutningi okkara kemur o.u. 1 mia. kr. úr Danmark — ella o.u. 2/3 av heildarútflutninginum.

Nú verður hildið forsvarligt at rokna við, at 75% av útflutninginum liggur eftir sum tjóðarúrtøka.

Av teimum 200 mió. kr. í útflutningi okkara til Danmarkar liggja tá eftir 150 mió. kr. sum føroysk tjóðarúrtøka. Av teimum 1.000 mió. kr. í útflutningi Danmarkar til okkara liggja tá eftir 750 mió. kr. sum donsk tjóðarúrtøka. Munurin har í millum verður tá 600 mió. kr. Danmørk til góðar.

Ella samnumtikið: Danmørk letur okkum í ríkisstudningi 400 mió. kr. Burtur úr teim donsk-føroysku handilsviðurskiftum fær Danmark 600 mió. kr.

Nettovinningur Danmarkar burtur úr hesum øllum verður tá 200 mió. kr. árliga.

— — —

Ymist annað kundi verið nevnt.

T.d. tann vinningur, ið danskir entreprenørar av ymiskum slagi hava her — Phil & Søn, Højgård & Schultz og hvat teir nú allir eita.

Í donskum virðisbrøvum av ymiskum slagi hava føroyskir peningastovnar standandi 560 mió. kr. Aftur at hesum koma aðrar ókendar upphæddir, ið vit lítið vita um, soleiðis at upphæddin av føroyskum peningi í Danmark óivað fer upp um 1 mia. kr.

Soleiðis sær tá hin sanna mynd út av teimum donsk-føroysku peningaviðurskiftunum.

Tjóðveldisflokkurin hevur striðst fyri at fáa skil á hesum rangvørgu, ónyttugu og ómoralsku viðurskiftum.

Í fyrsta lagi soleiðis, at allar hesar mongu útreiðslur til umsiting og rakstur verða býttar um við heildarstuðul til fløguendamál, t.e. til uppbygging landsins og vinnulívsins.

Í øðrum umfari soleiðis, at hesin heildarstudningur minkar so hvørt sum ræði okkara yvir egnum viðurskiftum veksur, hagar til hann heilt hvørvur, samtíðis sum vit hava vunnið fult og heilt politiskt frælsi.

Treytin fyri hesum er, at vit fáa heilt nýggja skattalóg, heilt nýggja tolllóg, soleiðis at tey, sum nú sleppa undan at bera sjálvsagdar byrðar, nú koma undir hesar skyldur.

Seinastu árini hava vit havt støðugan og rættiliga javnan vokst í tjóðarinntøku okkara. Tað er eingin grund til at halda annað enn, at hesin vøkstur kemur at standa við eisini kommdi ár, soleiðis at hesin vøkstur kemur at viga upp móti líðandi minking í teimum donsku peningaveitingunum.

Taka vit saman um tað, ið her hevur verið bent á, verður heildarmyndin av teim føroysku-donsku peningaviðurskiftunum hendan:

Tann stuðul, ið vit fáa, er eingin hjálp til sjálvhjálp, eingin uppbyggingarhjálp, hvørki til landið ella vinnulívið.

Tey, sum í Føroyum njóta gott av hesi skipan, eru ikki tey gomlu, tey sjúku ella børnini. Tey, sum í veruleikanum skúma rómman her hjá okkum, eru tey ríku, sum á hendan hátt sleppa sær undan sjálvsøgdum menniskjaligum og samfelagsligum skyldum móti teim gomlu, teim sjúku, børnunum.

Og fyri hetta ofra vit ræði okkara yvir egnum viðurskiftum.

Tey, sum í Danmark bera byrðarnar, eru vanligir skattagjaldar, har ímillum verkamenn og fólkapensjónistar.

Teir, sum har hava vinningin, eru teir donsku heilsølumenninir, sum hava handilin við Føroyar.

Niðurstøðan verður tí tann, at henda skipan er landi okkara ikki til nakra sum helst nyttu, og hon er har afturat óverdug og ómoralsk.

Vit mugu nú koma okkum burtur úr hesum óskili. Tað kann ikki vera meiningin, at vit um ævigar tíðir skulu liva sum útreiðslutal á útlendskari fíggjarlóg, ið har afturat bert veksur utlan enda.

Ein gongd leið er tann, ið her verður mælt til at ganga, nevniliga at hinar mongu donsku fíggjarveitingar verða umbýttar við eina heildarveiting, ið síðan minkar, so hvørt sum ræði okkara yvir egnum viðurskiftum veksur.

1. viðgerð 17. februar. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 6. apríl legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 15. februar 1984 og undir 1. viðgerð tann 17. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meirilluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) tekur ikki undir við málinum og setir eituki uppskot fram.

Minnilutin (Ove Mikkelsen og Adolf V. Hansen) tekur undir við uppskotinum.

Minnilutin (Atli P. Dam) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 11. apríl 1984. Uppskotið fall við 9 ja-atkvøðum, 6 nei-atkvøðum, 16 atkvøddu ikki, 1 var burturstaddur.

Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Juul Jacobsen, Adolf V. Hansen, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen, Jógvan Sundstein.

| | |
|---|---|
| Nei atkvøddu: | Flemming Mikkelsen, Eilif Samuelsen, Jákup Lamhauge, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen. |
| Atkvøddu ikki: | Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik, Olsen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Jákup Lindenskov, Atli Dam, Arne Ziskasen, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Olaf Olsen, Ivan Johannesen. |
| Burturstaddur: | Agnar Nielsen. |

---

# 53. Løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum.

Ár 1984, 24. februar legði edv-nevndin fram soljóðandi

**Álit**

Í løgtingssetuni 1981 legði landsstýrið fram uppskot til løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum (tingmál nr. 74/1981).

Eftir uppskoti landsstýrisins skuldi lógin fevna um EDV-eftirlitið við allari almennu fyrisitingini í Føroyum, t.v.s. eisini við fyrisitingini hjá ríkisstovnunum í Føroyum.

Undir 1. viðgerð og í skrivi dagfest 11. mars 1982 gjørdi ríkisumboðsmaðurin vart við, at løgtingið bert hevði heimild til at lóggeva fyri EDV-skráir, sum verða førdar fyri myndugleikar undir heimastýrinum.

Málið varð beint í eina serliga EDV-millumtinganevnd, sum tann 27. december 1982 legði fram álit á málinum (løgtingsmál nr. 50/1982).

Størsti nevndarbólurin mælti til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum við 24 ymiskum broytingum, m.a. teimum, at lógin bert kom at fevna um fyrisitingina undir heimastýrinum.

Undir 2. viðgerð tann 20. januar 1983 varð málið beint í nevndina til viðgerðar. Tann 1. juni 1983 legði nevndin, sum hevði býtt seg í 4 minnilutar, fram nýtt álit í málinum, men heldur einki av hesum tilmælum vann frama, og varð málið aftur beint í nevndina, sum skuldi halda fram sum millumtinganevnd til víðari viðgerð av málinum.

Í oktober mánaði 1983 hava landsstýrið og Olaf Olsen, løgtingsmaður, havt samráðingar við danska løgmálaráðharran um møguleikarnar fyri eini samskipan av skrásetingareftirlitinum bæði við skráum hjá heimastýrinum og ríkismyndugleikunum í Føroyum.

Úrslitið av samráðingunum varð, at løgmálaráðharrin við skrivi dagfest 10. oktober 1983 hevur góðkent, at eitt felags skrásetingareftirlit verður at hava eftirlit bæði fyri skráir, ið verða førdar fyri stovnar undir heimastýrinum og ríkisstovnum í Føroyum. Eftirlitið við skráum hjá ríkismyndugleikum kemur tó at fara fram eftir donsku lógini, sum ætlanin er at seta í gildi í Føroyum við kongaligari fyriskipan við slíkum broytingum, at hon kemur at samsvara við føroysku lógina.

Í teimum førum, har skrásetingareftirlitið kemur at vigera spurningar um skráir, ið verða førdar fyri ríkismyndugleikar, verður skrásetingareftirlitið eftir føroysku lógini víðkað við 1 limi, ið verður útnevndur av ríkisumboðsmanninum.

Vísandi til frammanfyri standandi mælir ein bólkur í nevndini (Olaf Olsen, Eli Nolsøe, Frederik Olsen) tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum í løgtingsmáli nr. 71/1981: Lóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum við fylgjandi

**broytingum**

| | |
|---|---|
| Í lógaryvirskriftini verður »lóg« broytt til »løgtingslóg«. | 1) I lovens overskrift ændres »lov« til »lagtingslov«. |
| § 1, stk. 1, verður aftaná orðini »almennu fyrisitingina« | 2) I § 1, stk. 1, tilføjes efter ordene »den offentlige forvalt- |

sett: »undir heimastýrinum«.

ning«: »under hjemmestyret«.

3) Í § 4, stk. 1, verða orðini »Lands- ella ríkismyndugleika« broytt til: »Landsmyndugleikar«.

3) I § 4, stk. 1 ændres ordene »lands- eller statsmyndighed« til: »landsmyndighed«.

4) Í § 4, stk. 3, § 4, stk. 4 og § 7, stk. 3 verður orðið »ymisk« broytt til »hvør sítt«.

4) Uændret.

5) Í § 4, stk. 3, gongur seinasta punktum út.

5) I § 4, stk. 3, udgår sidste punktum.

6) Í § 6, stk. 4, gongur seinasta punktum út.

6) I § 6, stk. 4, udgår sidste punktum.

7) Í § 7, stk. 3, gongur seinasta punktum út.

7) I § 7, stk. 3, udgår sidste punktum.

8) Í § 8, stk. 2, 1. punktum, verður aftaná orðini »sum settar« sett: »eru«.

8) Uændret.

9) Í § 9, stk. 2, verður skoytt uppí: »Persónsnummar hava bert onnur enn fólkayvirlitini loyvi at skráseta og nýta, um hetta er neyðugt til at kunna røkja sínar skyldur mótvegis skattavaldinum, sum eisini er tann einasti, ið kann nýta samkoyring.«

9) I § 9, stk. 2, tilføjes: »Personsnummer kan kun andre end folkeregistrene registrere og benytte, såfremt dette er nødvendigt for at kunne opfylde sine forpligtelser overfor skattevæsenet, som også er den eneste, der kan benytte samkøring.«

10) Í § 11 verður orðið »Tørvandi« broytt til: »Neyðugt«.

10) Uændret.

11) Í § 12, stk. 1, verður orðið »Tørvandi« broytt til »Neyðugt«.

11) Uændret.

12) Í § 13, stk. 5, 1. punktum, verður aftaná orðið »gera« sett: »vísindaligar« og aftaná 1. punktum verður innskotið: »Hesar upplýsingar skulu ikki kunna vísa til ávísar persónar í samfelagnum.«

12) I § 13, stk. 5, 1. punktum indsættes efter ordet »foretage«: »videnskabelige« og efter 1. punktum indskydes: »Disse oplysninger må ikke kunne vise til bestemte personer i samfundet.«

13) Í § 16, stk. 1, ganga út orðini »ella upplýsingarnar frammanundan eru alment tilgeingiligar.«

13) I § 16, stk. 1, udgår ordene »eller oplysningerne i forvejen er offentligt tilgængelige.«

14) Í § 17 verður 1. punktum orðað soleiðis: »Upplýsingar um ávís fólk er loyvt at lata víðari til privat virki og onnur, sum sambært lóg ella avtalu hjálpa til at greiða arbeiðið hjá avvarðandi myndugleika«.

14) Uændret.

15) Í § 18, stk. 3, verður 2. punktum orðað soleiðis:
»At lata upplýsingar víðari til ætlaða samkoyring við skrá, sum lógin ikki fatar um, er bannað«.

15) I § 18, stk. 3, affattes 2. punktum således:
»Videregivelse af oplysninger med henblik på samkøring med registre, der ikke omfattes af loven, er forbudt.«

16) Í § 19, stk. 2, gongur 2. punktum út.

16) I § 19, stk. 2, udgår 2. punktum.

17) Í § 22, stk. 1, verður 2. pkt. soleiðis:
»Skráseting arefirlitið útinnir haraftrat tey størv, sum løgd eru undir eftirlitið eftir løgtingslóg um privatar skráir o.o. og eftir kongaligari fyri-

17) I § 22, stk. 1, affattes 2. pkt. således:
»Registertilsynet udøver endvidere de funktioner, der er henlagt til tilsynet ved lagtingslov om private registre m.v. og kgl. anordning i

skipan sambært § 32 í lóg nr. 294 frá 8. juni 1978 »om offentlige myndigheders registre vedrørende registre på Færøerne, der føres for rigsmyndighederne.«

18) § 23 verður orðað soleiðis:
»Eftirlitið, sum landsstýrið setir, er skipað av formanni, sum skal vera løgfrøðingur, 1 datakønum limi, 1 limi við kunnleika til fyrisiting, 2 limum umboðandi lønmóttakarafeløgini og 2 limum umboðandi arbeiðsgevarafeløgini. Limirnir og varamenn teirra verða útnevndir fyri 4 ár.«
*2. stk.* Í málum um skráir, sum verða førdar fyri ríkismyndugleikar, verður eftirlitið víðkað við einum limi, ið verður útnevndur av ríkisumboðsmanninum.

19) Í § 25, stk. 2, verður aftaná orðini »Limirnir og« sett: »leiðandi«.

20) Óbroytt.

21) Í § 27, stk. 1, verður orðið »kann« broytt til: »skal«.

22) Í § 27, stk. 2, ganga út orðini »§ 18, stk. 3« og »§ 19, stk. 2«.

henhold til § 32 i lov nr. 294 af 8. juni 1978 om offentlige myndigheders registre vedrørende registre på Færøerne, der føres for rigsmyndighederne.«

18) § 23 affattes således:
»Tilsynet, der nedsættes af landsstyret, består af en formand, der skal være jurist, 1 datakyndigt medlem, 1 medlem med administrativ erfaring, 2 medlemmer repræsenterende lønmodtagerorganisationerne og 2 medlemmer repræsenterende arbejdsgiverorganisationerne. Medlemmerne og stedfortrædere for disse udnævnes for 4 år.«
*Stk. 2.* I sager om registre, der føres for rigsmyndighederne, tiltrædes registertilsynet af et medlem, der udpeges af rigsombudsmanden.

19) I § 24, stk. 2, indføjes efter ordene »Tilsynets medlemmer og«: »overordnet«.

20) I § 25, stk. 2, ændres ordet »behørlig« til: »behørig«.

21) I § 27, stk. 1, ændres ordet »kan« til: »skal«.

22) I § 27, stk. 2, udgår ordene »§ 18, stk. 3« og »§ 19, stk. 2«.

23) Í § 29, stk. 1, verða orðini »1. apríl 1982« broytt til: »1. apríl 1984«.

23) I § 29, stk. 1, ændres ordene »1. april 1982« til: »1. april 1983.«

*Minnilutin* (Adolf V. Hansen) viðmerkir, at síðan málið varð framlagt í 1981 og síðan bæði álit I og álit II vórðu framløgd, er so nógv nýtt komið fram um edv-skráir, edv-skraseting og møguleikar við edv-skrásetingum eins og vandarnar við skrásetingum á edv-tólum, at lógin longu verður ótíðarhóskandi, áðrenn hon er viðtikin.

Tað eigur tí beinan vegin at verða niðursett ein millumtinganevnd til endurskoðan av lógunum um almennar skráir og um privatar skráir (um tann lógin kemur fram aftur í tí líki, hon varð framløgd av landsstýrinum í 1981).

Út frá teirri meting, at betur er ring hurð heldur enn eingin, eigur edv-lógin í broyttum líki at verða viðtikin og sett í gildi.

Hóast tað gongur á triðja ári, at málið er til viðgerðar, kann ikki sigast, at nevndin nú leggur fram eitt fullfiggjað ella gott lógaruppskot. Uppskotið er ikki aunað enn ein umseting av teirri avoldaðu donsku lógini, tó við smærri broytingum, harav onkur er herðandi í mun til donsku lógina.

Minnilutin kundi taka undir við størsta nevndarbólkinum, tá álit I og álit II vórðu framløgd, tó við undantak av broytingunum 2, 3 og 11 (nú 9).

Minnilutin kann framvegis taka undir við somu broytingaruppskotum hjá størsta nevndarbólkinum, men kann, sum nevnt ikki taka undir við broyting 2 og 3, sum avmarka lógina til ikki at umfata danskar skráir her á landi, og 9, ið gevur einum og hvørjum, sum hevur tað minsta við skatt at gera, loyvi at nýta almenna persónsnummarið sum edv-lykil, t.v.s. at hava møguleikar at samankoyra edv-skráir.

Eftir at nevndarformaðurin, í heimildarloysi, hevur havt samráðingar vi danska løgmálaraðharran Ninn Hansen og landsstýrið í tí sambandinum fekk bræv frá sama, dagf. 10. oktober 1983, hevur størsti nevndarbólkurin (sambandið, fólkaflokkurin og gamla sjálvstýrið) gjørt broytingar til uppskot landsstýrisins, ið ikki eru minni enn at stinga føroysku vunnu rættindi, so sum partvíst sjálvstýri, í ryggin, í og við at danir skulu hava ein lim í teirri føroysku eftirlitsskipanini. Eitt stig á sambandsleið, og kann Framburðsflokkurin undir onguni umstøðum taka undir við tílíkum.

Her, eins og í málinum um at taka upp samráðingar við danir um undirgrundina og havbotnin, liggur í sjálvari lógarviðtøkuni, ein viðurkenning av, at alt, sum ikki er nevnt í heimastýrislógini, uttan mun til um tað stavar frá tíðini undan ella eftir, at heimastýrislógin kom í gildi, er undir donskum yvirvaldi og danskari lóggávu (samanber broytingaruppskot 17) frá største nevndarbólkinum, frá orðunum »... og eftir kongiligari fyriskipan ...«, og broytingaruppskot 18) *2. stk.* Føroyingar eiga at avgeva tann myndugleika, teir hava vunnið.

Verður ein millumtinganevnd niðursett at arbeiða víðari við lógunum um edv-skráir við teirri ætlan at gera hesar meira rættvísar og gagnligar fyri allar partar, eigur hon at hava fyri eyga:

1) Hvørji áhugamál eigur lógin at røkja.
2) Hvørjar persónligar upplýsingar eigur at vera loyvt at skráseta
   a) við loyvi frá viðkomandi
   b) uttan loyvi frá viðkomandi
   d) bert treytað av at viðkomandi hevur fingið fráboðan um skrásetingina.
3) Hvørjar upplýsingar vandaleyst kunnu skrásetast og hvørjar upplýsingar, ið bert kunnu skrásetast í trúnað og við serloyvi frá edv-eftirlitinum.

Tílík millumtinganevnd eigur at minnast til, at skráseting sum so ikki er nakað nýtt fyribrigdi, men tað eru ymsir stórrir munir á vanligari (manuellari) skráseting og edv-skráseting. Her kunnu nevnast triggir teir størstu munirnir (sum samstundis eru fyrimunirnir hjá teimum, ið áhuga hava fyri skráseting av persónligum upplýsingum til brúk ella misbrúk):

1) Edv-skráir taka so lítið pláss, at allar upplýsingar um allar føroyingar í eitt hundraðáraskeið kunnu goymast í einum skartgripaskríni.
2) Edv-tól geva betur møguleika at samanbera, sameina og sum heild at samankoyra persónligar upplýsingar.
3) Edv-skráir eru sparandi, tí tær eru skjótar at arbeiða við. Allar upplýsingar fáast fram upp á stutta tíð, og skuldu tær vanligu longu bíðitíðirnar, serstakliga innan tað almenna, kunna stytst nakað.

Vandarnir við edv-skráseting eiga ikki at vera gloymdir. Soleiðis kann nevnast:

at skrásetingin kann gerast so umfatandi og persómlig, at hon er ein vandi í sjálvum sær fyri einstaklingin,

at brúk av edv kann koma at broyta og skaða arbeiðsumhvørvið í heilt stóran mun. Soleiðis kann nevnast, at skrásetingin kann oyðileggja viðurskiftini millum arbeiðara og leiðslu, millum myndugleika og borgara og millum handlandi, læknar, servicefólk, bankar og onnur øðrumegin og kundan hinumegin. Hetta tí ta vandi er fyri minkandi persónligum sambandi, ið sum kunnugt er ein av menniskjans viðføddu tørvum,

at edv-tólini fækka um arbeiðsplássini,

at vandi er fyri, at har ein áður á almennum skrivstovum og aðrastaðir gav persónligar upplýsingar fyri at fáa eini ókeypis ráð, verða tær givnu upplýsingar nú edv-skrásettar, við vanda fyri seinni at standa viðkomandi í vegin aðrastaðir, har tær av tilvild ella óvart eru komnar inn á citt edv-tólið,

at edv-tólið gloymir ikki, og í og við at menniskju eru ymisk, bæði tann, sum verður skrásettur, og tann, sum skrásetir, so lúra her vandar, sum vit enn í dag ikki kunnu síggja fylgjurnar av. Nevnast skulu fylgjandi skrásetingar, sum kanska kunnu gerast vandamiklar fyri einstaklingin, men sum í dag eru loyvdar: *kreditvirði, arbeiði, psykiatriskar kanningar, straffir, brúk ella misbrúk av nýtilsisevnum* í farnari tíð og so víðari.

Út frá tí, sum omanfyri er nevnt, setir minnilutin fram fylgjandi

**Broytingaruppskot**

| | |
|---|---|
| Í § 9, 2. stk. verður skoytt upp í: | I § 9, stk. 2 tilføjes: |
| »Persónsnummar má umframt av fólkayvirlitinum bert nýtast av skattamyndugleikunum og bert í skattamálum.« | »Personnumrner må foruden af folkeregistrene kun benyttes af skattemyndighederne og kun i skattesager.« |

Sami minniluti setir fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið niðursetir eina millumtinganevnd við einum limi úr hvørjum flokki at eftirkanna lógina um persónsnummar, lógirnar um almennar og privatar skráir og at leggja fyri tingið neyðug broytingaruppskot uttan óneyðuga seinkan.

Ein annar minniluti (Petur Reinert og Jóannes Dalsgaard) hevur verið saman við meirilutanum til at gera fleiri broytingaruppskot til upprunauppskot landsstýrisins.

Tó hevur minnilutin sína egna støðu í spurninginum um ávísar greinir, tí vit meta ikki, at meirilutans uppskot geva borgarunum nóg góðan tryggleika.

Minnilutans uppskot eru í hesum førum at meta sum strangari enn meirilutans uppskot.

Talan er um §§ 1 og 4, ið snúgva seg 1) um hvønn myndugleika lógin skal fevna, 2) um § 9 um nýtsluna av persónsnummarið, 3) um § 22, sum ein fylgja allar staðir til er §§ 1 og 4 og 9) um § 23 um eftirlit við EDV-skránni.

Stutt um serstøðu minnilutans kann sigast, at hann metir tað vera rættast at halda seg til upprunauppskot landsstýrisins. Hetta merkir, at lógin eigur at fevna um allar almennar myndugleikar í Føroyum.

Annars er endamálið við okkara uppskoti um § 9 nýtsluna av persónsnummar at fyribyrgja misbrúki, og endamálið við minnilutans uppskoti til § 22 er at tryggja eitt so demokratiskt og uttanveltað eftirlit sum møguligt.

Onnur broytingaruppskot frá minnilutanum hava størri tryggleika sum mál.

Minnilutin skjýtur sostatt upp fylgjandi:

a) § 1: verður orðað sum uppskot landsstýrisins.
b) § 8: síðsta punktum gongur út.
c) § 9: Persónnummar hava bert almennir stovnar loyvi at skráseta og nýta. Hetta er bert galdandi, um persónsnummar er neyðugt, fyri at almennur stovnur skal kunna røkja skyldur sínar mótvegis skattavaldinum.
d) § 10: Í staðin fyri »kann« verður sett »skal«.
e) § 15: Síðsta punktum verður orðað soleiðis:
»Avgerðin hjá skrásetingareftirlitinum kann leggjast fyri rættin.«
f) § 22, stk. 1, verður 2. pkt. orðað soleiðis:
»Skrásetingareftirlitið útinnir harafturat tey støvv, sum løgd eru undir eftirlitið eftir lóg um privatar skráir o.a.«

g) § 23 verður orðað soleiðis:
»Eftirlitið við 6 limum verður skipað á hendan hátt:
*Sorinskrivarin* tilnevnir formann, ið skal verða løgfrøðingur.
*Føroya Løgting* tilnevnir 2 limir, ið skulu vera datakønir og óheftir av privatum dataáhugamálum.
*Løntakarafeløgini* á landi og sjógvi velja í felag 2 limir í eftirlitsnevndina.
*Brúkarafelagið* tilnevnir eitt lim.
Limir og tiltakslimir sita í minsta lagvi 4 ár. Teir kunnu vera afturvaldir.

Minnilutin ynskir annars ar føra fram, at mesta arbeiðið í nevndini er farið fram. áðrenn landsstýrið legði samtíðarskattskipan fyri løgtingið.

Meðan arbeiðið fór fram, varð av limum sýtt at fáa allar neyðturviligar upplýsingar um samtíðarskattaskipanina - serstakliga uppkrevjingarskipan og hátt.

Aftan á, at nevndin hevði endað sítt arbeiði og bíðað var eftir statsrættarligu útgreiningum, legði landsstýrið samtíðarskattaskipan fyri tingið, og varð hon samtykt uttan nakra eftirlitslóggávu.

Sum kunnugt er við nevndu skattaskipan tilætlað ein so umfatandi samanblanding av almennum og privatum EDV-áhugamálum, at umboðini fyri Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin ikki kundu góðtaka hesa uppkrevjingarskipanina.

Undir uppkrevjingarskipanini av samtíðarskattamálinum fara privatir peningastovnar og EDV-fyritøkur at umsita ein stóran part av samtíðarskattaskipanini.

Við hesum er ein týðandi samfelagsuppgáva latin privatum.

Hetta er ikki ætlað sum ein yvirgangsloysn til bíða verður eftir einum almennum skattastovni við egnari EDV-miðstøð, men verður

gjørt av principiellum grundum, upplýstu umboð fyri samgonguna undir viðgerðini av samtíðarskattamálinum.

Minnilutin metir, at hesin umsitingarháttur ber í sær vandan fyri, at privatir peningastovnar og EDV-virkir sum frá líður fara at sita inni við umfatandi og heilt óviðkomandi upplýsingum um privat viðurskifti hjá borgarunum.

Hetta er nakað, sum kann gerast ein hóttan í móti persónligu trygd, frælsi og privatlívi einstaklingsins.

Tað er sostatt eftir minnilutans tykki tørvur á strongum reglum fyri nýtslu av persónsnummari og fyri samankoyring av skráum, ið skulu tæna skattavaldinum.

Somuleiðis metir minnilutin, at eftirlitsnevndin ikki eigur at verða vald av landsstýrinum, men av sorinskrivaranum, løgtingi og ávísum felagsskapum.

Minnilutin — umboð Javnaðarfloksins og Tjóðveldisfloksins — átalar, at tað hevur gingið so seint við nevndararbeiðinum, og sami minniluti heldur tað verða stórt spell, at arbeiðið í lógaruppskotinum um eftirlit við privatum EDV-skráum onga leið er komið enn, hóast uppskotið liggur í nevnd á triðja ári.

Hetta seinasta hálva árið hevur prógvað, at álvarsamir trupulleikar eru á ávísum virkjum — trupulleikar, sum standast av EDV-skráseting av einstaklingaarbeiði.

Tað er tí eyðsæð, at stórur tørvur er á lóggávu at regulera, hvat ein arbeiðsgevari hevur loyvi at skráseta, og hvat hann ikki hevur loyvi at skráseta.

Hóast hetta tykjast samgonguflokkarnir, ið eiga formann í EDV-nevndini ongan áhuga hava fyri at fáa lóggávuarbeiði viðvíkjandi privatari skráseting frá hondum.

Hetta átalar minnilutin og vónar, at tað nú skjótt kemur vend í, tí verður bíðað ov leingi — er vandi fyri, at øll lóggáva móti privatari EDV-misnýtslu verður so at siga nyttuleys.

Minnilutin setir tí fylgjandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur EDV-nevndini at leggja álit um privatar EDV-skráir fyri løgtingið í seinasta lagi 15. apríl 1984.

20. mars løgdu Jóannes Dalsgaard og Petur Reinert, løgtingsmenn, fram soljóðandi

**broytingaruppskot**

§ 9, stk. 2 verður orðað soleiðis:
»Ikki er loyvt at skráseta upplýsingar um politisk viðurskifti. Aðrar upplýsingar, sum viðvíkja heilt persónligum viðurskiftum, her uppií upplýsingar um ættarslag, átrúnað og lit, um kynslig og revsiverd viðurskifti og eisini upplýsingar um heilsustand og ovurnýtslu av njótingarevnum o.t., er ikki loyvt at skráseta.«

20. mars løgdu Jóannes Dalsgaard og Petur Reinert løgtingsmenn fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um forboð móti privatari EDV skráseting.**

**§ 1.** So leingi lóggáva um privatar skráir ikki er samtykt av Føroya Løgtingi, verður forboð sett privatum arbeiðsgevarum at stovna og/ella nýta EDV skráir við upplýsingum um arbeiðsavrik, sjúkradagar og onnur starvsviðurskifti hjá tí einstaka arbeiðaranum og viðkomandi virki.

**§ 2.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

2. viðgerð 9. mars. Atkvøðugreiðsla 16. mars.

Broytingaruppskot frá minniluta Petur Reinert og Jóannes Dalsgaard A. § 1 - § 3 fall við 13-0, B. § 8 fall við 13-0, C. § 9, 2. stk.

fall við 13-0, D. § 10 fall við 13-0, E. § 15 fall við 13-0, F. § 22, 1. stk. fall við 15-0, G. § 23, 1. stk. fall við 13-0.

Broytingaruppskot frá minnilutanum (Adolf V. Hansen) til § 9, 2. stk. fall við 15-0.

Broytingaruppskot frá største bólkinum í nevndini til pkt. 1, § 1 samtykt við 17-1, pkt. 2, § 1 samtykt við 17-0, pkt. 3, § 1, samtykt við 17-0, pkt. 4, § 4, samtykt við 17-0, pkt. 5, § 5, samtykt við 17-0, pkt. 6, § 6, samtykt við 17-0, pkt. 7, § 7, samtykt við 17-0, pkt. 8, § 8, samtykt við 17-0, pkt. 9, § 9, samtykt við 19-0, pkt. 10, § 11, samtykt við 17-0, pkt. 11, § 12, samtykt við 17-0, pkt. 12, §13, samtykt við 18-0, pkt. 13, § 16, samtykt við 19-0, pkt. 14, § 17, samtykt við 17-2, pkt. 15, § 18, samtykt við 20-0, pkt. 16, § 19, samtykt við 17-0, pkt. 17, § 22, samtykt við 17-0, pkt. 18, § 23, stk. 1, samtykt við 19-0, stk. 2 samtykt við 22-0, pkt. 19, § 25, samtykt við 20-0, pkt. 20 óbroytt, pkt. 21, § 27, samtykt við 19-0, pkt. 22, § 27 og § 19 samtykt við 19-0, pkt. 23, § 29, samtykt uttan atkvøðugreiðslu. Upprunauppskotið §§ 1 - 21, kap. 1-6 samtykt við 19-0.

Kap. 7, § 22 samtykt við 17-0.

§ 23, 1. stk. samtykt við 19-0, 2. stk. samtykt við 22-0.

§§ 25 til 27 samtyktar við 19-0.

Kap. 8, § 28, samtykt við 19-0.

Kap. 9, § 29, samtykt við 19-0.

Uppskotið soleiðis broytt og samtykt at fara til 3. viðgerð, varð samtykt við 19-1.

Uppskotið til samtyktar frá Jóannes Dalsgaard og Petur Reinert fall við 15-0.

Uppskotið til samtyktar frá Adolf V. Hansen fall við 14-0 atkvøðum.

3. viðgerð 30. mars. Broyting til § 9, 2 stk. fall við 12 ja-atkvøðum, 19 atkvøddu ikki, 1 var burturstødd. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Beck, Jørgen Thomsen, Jákup Lindenskov, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Juul Jacobsen, Adolf V. Hansen, Arne Ziskasen, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Aage Ellefsen, Olaf

Olsen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellesen, Jógvan Sundstein.
Burturstødd: Karin Kjølbro.

Uppískoytisuppskot § 1 fall við 12-0.
Málið soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 19-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 535-1. Lóg nr. 62 frá 5. juni 1984.

---

# 54. Stovnseting av landsbanka.

Ár 1984, týsdagin 21. februar legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum beinan vegin at seta Landsbanka Føroya á stovn sambært løgtingslóg nr. 57 frá 2. oktober 1978 um Landsbanka Føroya.

**Viðmerkingar:**
Í september 1978 samtykti Føroya løgting lóg um Landsbanka Føroya. Eisini samtykti løgtingið viðtøkur fyri Landsbanka Føroya og lóg um ábyrgdarskyldu fyri stovnsfæ Landsbankans (Løgtingstíðindi 1978 Bind A, p. 81 ff.).

Endamál Landsbankans var at reka samfelagsáhugamál. Hetta merkir, at bankin var ætlaður at vera eitt amboð í búskaparpolitikkinum til tess at halda uppi trygg fíggjarviðurskifti. Somuleiðis skuldi bankin tryggja eina javna útbygging av føroyska samfelagnum.

Meira nágrieniliga kann uppgáva landsbankans lýsast við at vísa á, at hann eftir lógini var ætlaður at vera bankasamband landskassans, eins og hann skuldi verið ráðgevandi hjá almennum myndugleikum í sambandi við lántøkur uttanlands.

Harumframt skuldi Landsbanki Føroya samskipa lántøku hjá føroyskum kommunum.

Hóast landsbankin ikki var ætlaður at vera tjóðarbanki við øllum vanligum tjóðarbankauppgávum og tjóðarbankamyndugleika, hevur hann kortini sambært lógina nakrar ávísar týdningarmiklar tjóðarbankauppgávur, t.d. at vera við til at leggja bústaðarpolitikkin til rættis.

Sum kunnugt er landsbankin enn ikki settur á stovn, hóast tað nú eru úti við fimm ár, síðan lógir og viðtøkur vórðu samtyktar á løgtingi.

Fíggjarliga og búskaparliga gongdin serstakliga tey síðstu trý árini hevur prógvað, hvussu stórur tørvurin er á einum landsbanka við tjóðarbankaliknandi myndugleika.

Fíggjarligu og búskaparligu trupulleikarnir eru støðugt vaksandi, og er hetta til stóran meinboga fyri Føroya fólk og føroyskt vinnulív.

Hóast vaksandi fíggjarligar og búskaparligar trupulleikar letst landsstýrið ikki um vón, men letur bert standa til.

Hesin politikkur, sum gongur út upp á at lata standa til, at lata fíggjarligu og búskaparligu gongdina fara fram sum best ber til uttan nakað slag av stýring, hevur ført til eina uttanlandsskuld, sum er trífaldað eftir fáum árum og sum nú er uppi á 2,3 mia.

Víðari hevur hesin »sum best ber til«-politikkur ført til *at útlánsrentan* í Føroyum nú er so høg, at rentubyrðarnar eru til slíkan meinboga fyri vinnulív og tey, sum seta búgv, *at lánmoguleikarnir* hjá kommununum ikki eru nóg góðar.

Samanumtikið er stórur saknur í einum landsbanka, og lagnaðar flokkurin heldur tí, at bankin eigur at verða settur á stovn uttan meiri drál.

Tað tykist tí, sum landsstýrið onga ætlan hevur um at fremja løgtingslógina um landsbankan, og flokkurin heldur tí, at løgtingið má áleggja landsstýrinum nakað so sjálvsagt sum at halda landsins lógir.

Tí verður hetta uppskotið til samtyktar lagt fyri løgtingið.

1. viðgerð 24. februar. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 9. mars. Atkvøðugreiðsla 16. mars. Málið fall við 15 jaatkvøðum, 17 atkvøddu ikki.
Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Jákup Lindenskov, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Arne Ziskasen, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Olaf Olsen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Jacob Lamhauge, Jógvan I. Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein.

F.L.j.nr. 1400-9-1.

---

# 55. Veðhald fyri lánið til P/f Faromar, Tórshavn.

Ár 1984, fríggjadagin 17. februar legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

## Uppskot til

**løgtinglóg um veðhald fyri láni til P/f Faromar, Tórshavn.**

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri einum lánið til P/f Faromar, Tórshavn, upp á 90% av 3,5 mió. kr.

*2. stk.* Treyt fyri veðhaldinum er, at felagið útvegar í minsta lagi 10% av 3,5 mió. kr. afturat í láni. Lánið má ikki kunna krevjast afturgoldið eftir stytri tíð enn afturgjaldingartíðin galdandi fyri tað lánið, landskassin veðheldur fyri.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om garanti for lån til P/f Faromar, Tórshavn.**

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et lån til P/f Faromar, Tórshavn, på 90% af 3,5 mio. kr.

*Stk. 2.* Det er en betingelse for garantien, at selskabet fremskaffer et yderligere lån på mindst 10% af 3,5 mio. kr. Lånet skal ikke kunne kræves tilbagebetalt på kortere tid end den tilbagebetalingstid, der er gældende for det lån, som landskassen garanterer for.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Víst verður til løgtingsmál nr. 126/1981, har løgtingið samtykti at seta kr. 100.000 sum partapening í P/f Faromar, í samband við royndarfiskiskap í vestur-afrikanskum sjógvi.

Nótabáturin Sjúrður Tollaksson hevur rikið royndarfiskiskap við Senegal frá januar 1982 til mai 1983, og metir felagið henda royndarfiskiskap at vera væleydnaðan.

Tó er tilvirkingarorkan á landi ikki í lagi, og er ætlanin at byggja frystihús í Dakar.

Samráðst hevur verið við ymiskar stovnar og felløg um frystihúsprojektið. Projektið hevur vakt stóran ans og fingið positiva undirtøku frá IFC (International Finance Corp., World Bank) og IFU (danski Industrialiseringsfonden for udviklingslandene). Møguleikar eru fyri, at hesir stovnar í komandi árum fara at nýta føroyingar sum partar í øðrum »joint-ventures«.

Projektið í Senegal er mett at kosta:

| | |
|---|---|
| Íløgur | 86,0 mió. kr. |
| Partur av royndarfiskiskapi | 9,5 - - |
| Rakstrarpeningur | 5,7 - - |
| | 101,2 mió. kr. |

Fíggingin ætlast soleiðis:

Partapeningur:

*Senegal:* Einstaklingar, bankar, menningargrunnur og IFC 19,3 mió. kr.

*aðrir:*

| | | |
|---|---|---|
| Faromar | 7,3 mió. kr. | |
| J. Lauritsen | 2,7 - - | |
| Donsk-senegalesisk felag | 3,7 - - | |
| IFU/IFC | 5,0 - - | 18,7 - - |
| | | 38,0 mió. kr. |

*Lánmøguleikar:*

| | | |
|---|---|---|
| IFU | 20,2 mió. kr. | |
| IFC | 22,4 - - | |
| Bankar í Senegal, Sveits o.a. | 20,4 - - | 63,0 mió. kr. |
| | | 101,0 mió. kr. |

Eftir hesum er partapeningurin hjá Faromar og J.L. 10 mió. kr., og er hetta partur av útreiðslunum til royndarfiskiskapin, konverteraður til partapening.

Útreiðslurnar til royndarfiskiskapin vóru tilsamans umleið 24 mió. kr., og restin er goldin av Faromar við 6,0 mió. og av J. Lauritzen við 8,0 mió. kr.

Partapeningur í P/F Faromar er:

| | |
|---|---|
| Bankar | kr. 2.000.000 |
| Faroe Seafood Trading | - 1.500.000 |
| Føroya Landsstýri | - 100.000 |
| Føroysk reiðarí | - 700.000 |
| - virkir og felag | - 850.000 |
| - einstaklingar | - 200.000 |
| Teknað, ikki inngoldið | - 50.000 |
| | kr. 5.400.000 |

Annars hevur landskassin við heimild í fíggjarløgtingslógini: Grunnur til fígging av fiskiskapsroyndum í fremmandum høvum veitt lán til Faromar upp á 2,2 mió. kr. og veðhald fyri kr. 200.000.

Likviditetsstøðan hjá Faromar/Senegal Seafood er nú henda:

| | | |
|---|---|---|
| Samlaðu útlegg til 1. januar 1984, umleið | 23,0 mió. kr. | |
| harav er partur J. Lauritzens | 9,9 mió. kr. | |
| Faromar, rest | 13,1 mió. kr. | |
| sum er fíggjað soleiðis: | | |
| Partapeningur, garanti o.a. | 8,0 mió. kr. | |
| I.F.U.-lán til Senegal Seafood | 2,0 - - | |
| Kreditorar í Føroyum | 0,3 - | |
| Bankar í dakar | 1,6 - - | |
| Kreditorar í Dakar | 1,2 - - | 13,1 mió. kr. |

Tað, sum felagið heldur vera neyðugt at gjalda nú, um projektið skal halda fram, er kreditorar í Føroyum og Dakar og banki í Dakar, ialt 3,1 mió. kr., og nakað av útreiðslum, sum hava verið síðani 1. januar 1984 og til Senegalesarar eru komnir upp í felagið, ætlandi aftan á tingingar í februar 1984 tilsamans 3,5 mió. kr. Vónir eru fyri at fáa nakað av hesum komandi útreiðslunum fíggjaðar av Nordisk Projekt Eksport Fond.

Tá nevndin í P/f Faromar hevur ta fatan, at ikki bert í Føroyum, men eisini í øðrum londum er stórur áhugi fyri, at hetta projekt verður realiserað og harvið eitt støði kann skapast fyri alternativum møguleikum og samansjóðing av veitingum av føroyskari vitan til menningarlond, hevur felagið søkt landsstýrið um stuðul/veðhald fyri 3,5 mió. kr.

Landsstýrið hevur ynskt at stuðla hesum tiltaki við einum veðhaldi upp á 90% av tí upphædd, ið søkt er um, treytað av at Faromar sjalvt útvegar 10%.

1. viðgerð 21. februar. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 6. apríl legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 17. februar 1984 og undir 1. viðgerð tann 21. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Undan viðgerðni í fíggjarnevndini eru útvegaðar upplýsingar viðvíkjandi projektinum, serliga fíggingini av íløgusíðuni.

Upprunapartapeningurin upp á kr. 550.000 er virðin hækkaður til nú tilsamans kr. 5.400.000. Tann í lógaruppskotinum í § 1 fortreytaði eginpeningur upp á 10% av kr. 3.500.000 ella kr. 350.000 er sostatt inngoldin.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) mælir sostatt til, at § 1 verður broytt samsvarandi hesum og setir fram soljóðandi

**broytingaruppskot**

til uppskot landsstýrisins:

§ 1 verður orðað soleiðis:

»**§ 1.** Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri einum láni til P/f Faromar, Tórshavn, upp á kr. 3.150.000.«

»§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et lån til P/f Faromar, Tórshavn, på kr. 3.150.000.«

Minnilutin (Atli P. Dam, Ove Mikkelsen og Adolf V. Hansen) tekur ikki undir við uppskotinum.

Atli P. Dam tilskilar, at støðutøka hansara er grundað á, *at* tann almenni tátturin er ov lítil, *at* ov fáar upplýsingar eru í málinum, *at* peningurin, ið veðhald verður søkt fyri, longu er brúktur.

Verður projektið betri upplýst í summar, kann málið takast upp aftur.

2. viðgerð 11. apríl. Broytingaruppskot frá meirilutanum í fíggjarnevndini til § 1 samtykt við 17-1, § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. Málið verður soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð samtykt við 17 ja-atkvøðum, 9 nei-atkvøðum, 5 atkvøddu ikki, ein var burturstaddur. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Agnar Nielsen, Fenning Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Arne Ziskasen, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Olaf Olsen, Eilif Samuelsen, Ivan

| | |
|---|---|
| | Johannesen, Jacob Lamhauge, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein. |
| Nei atkvøddu: | Adolf V. Hansen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen. |
| Atkvøddu ikki: | Tórálvur M. Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Jákup Lindenskov, Petur Reinert. |
| Burturstaddur: | Juul Jacobsen. |

3. viðgerð 13. apríl. Uppskotið soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 18-2 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1524-38. Lóg nr. 34 frá 3. mai 1984.

---

# 56. Kanning av møguleikunum fyri verju av umhvørvinum móti óneyðugari dálking.

Ár 1984, týsdagin 21. februar legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrnum at niðurseta eina nevnd av serkønum at kanna, hvat árin møguligar brennistøðir kunnu fáa á umhvørvið, og hvønn skaða tær møguliga kunnu gera á framtíðar vinnulívið (aling v.m.).

Eisini skal nevndin hava sum uppgávu at kanna møguleikarnar og fyrimunirnar av at byggja tílíkar brennistøðir í nánd av havgangandi streymi, til dømis á Kirkjubønesi, við Mykinesfjørðin, í Vestmannasundi og við líknandi støð.

Nevndin skal gera beinleiðis royndir við at finna útav, hvat ella hvørji sjóvarføll á teimum einstøku støðunum eru best egnað at sleppa burturkasti á sjógv, soleiðis at tað við vissu fer til havs.

Tingið samtykkir, at eingin bygging av brennistøð má byrja, fyrr enn henda kanning er lokin.

**Viðmerkingar:**

Nú í mong ár hevur talan verið um at byggja brennistøðir til tað burturkast, sum kemur frá virkjum, handlum og einstaklingum. Øll eru samd um, at neyðugt er sum skótast at finna eina loysn at burturbeina og helst tileinkisgera hetta burturkast.

Fyri landsins størstu kommunu varð hesin spurningur fyri mongum árum síðan loystur á ein hátt, sum teir, ið ráddu, og ráðgevarar teirra hildu vera ta røttu. Eftirtíðin hevur prógvað, at henda loysnin var ein heldur vánalig loysn, nútíðin leitar fjáltrandi eftir aðrari loysn.

Fyri tíðina er talan um tvinnar paralellar loysnir fyri stóran part av landinum. Ein fyri IRF og ein fyri Havnina.

Í báðum førum er talan um at byggja brennistøðir í nánd av og í sambandi við deyðavatn. Vit eiga at sýna okkara náttúru tað varsemi, at okkara fáu deyðavatnsøki ikki verða útsett fyri avoyðandi dálkingarvandum, soleiðis at alt lív í og við hesi øki doyggja út, eins og hendi við til dømis Limfjorden, Maas og Thems River.

Frá náttúrunnar hond er okkum givin streymur at halda váta umhvørvi okkara reint, og eiga vit í mest møguligan mun at gera brúk av hesi gávu náttúrunnar.

Ein brennistøð eigur at byggjast á tílíkum stað, at vit í mest møguligan mun binda um heilan fingur, soleiðis at skilja, at brennistøðin/

støðirnar eisini megna at at tileinkisgera enn ókent burturkast. Tað vil siga, at tílík framtíðar brennistøð eigur at uppfylla tvinnar høvuðstreytir:

1. At verða bygd so fjart frá fólki og virksemi (aling v.m.), at sjálvt framtíðar ókendu elturevni ikki kunnu roknast at gerast ein vaudi.
2. At verða bygd við tílíkan streymasjógv, at vissa fæst fyri, at alt, ið koyrt verður á sjógvin, rekur til havs og hvørvur í havsdýpinum.

Havast má í huga, at føroyingar júst eru byrjaðir uppá fiskaaling fram við landi, og at einki við vissu kann sigast um, hvussu stór í vavi hendan vinna verður framyvir, hvørki hvat viðvíkir tali av arbeiðsplássum ella parti av landsins útflutningi.

Møguleiki er eisini fyri, at landskassin í framtíðini fer at veðhalda fyri nevndu vinnu, og er tað tí eitt løgtings-/landsstýrismál at ansa eftir, at einki ella sum minst verður hesi vinnu til bága. Ella sagt við øðrum orðum:

Ruskmál eru kommunalmál, men verjan av umhvørvinum er landsmál.

1. viðgerð 14. mars. Málið var beint í umhvørvisnevndina, sum 7. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av Adolf Hansen, løgtingsmanni, 21. februar 1984 og undir 1. viðgerð 14. mars beint í umhvørvisnevndina.

Umhvørvisnevndin hevur viðgjørt málið á fundi 3. mai 1984, og setir nevndin einki uppskot fram.

2. viðgerð 8. mai. Uppskotið fall við 9-0 atkvøðum.

# 57. Sáttmáli millum Føroya og Noreg um markið.

Ár 1984, mikudagin 22. februar legði marknaðarnevndin fram soljóðandi

**Álit**

Landsstýrið hevur 31. august 1981 skrivað tinginum soljóðandi:

»Í skrivi 19. november 1980 hevur ríkisumboðsmaðurin fyrispurt, um landsstýrið hevur nakað at viðmerkja til, at viðlagda kunngerð frá 15. september 1980 viðvíkjandi »overenskomst af 15. juni 1979 med Norge om afgrænsinger af den kontinentale sokkel mellem Færøerne og om grænsen mellem fiskeriterritoriet ved Færøerne og den norske økoniomiske zone« verður kunngjørd at galda í Føroyum eftir lóg nr. 51 frá 1. apríl 1986 »om kundgørelse af love og anordninger på Færøerne.«

Landsstýrið hevur samtykt at leggja málið fyri løgtingið við frásøgn um, at landsstýrið hevur einki at viðmerkja til, at fyriskipanin verður galdandi í Føroyum.«

Málið varð beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur latið serkøna hjálp eftirrokna støðini í »overenskomst af 15. juni 1979 med Norge om afgrænsningen af den kontinentale sokkel i området mellem Færøerne og Norge og om grænsen mellem fiskeriterritoriet ved Færøerne og den norske økonomiske zone«, art. 2.1 in fine, og eru tey í samsvar við tølini í sáttmálanum.

Samd marknaðarnevnd setir fram soljóðandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið góðkennir, at »Overenskomst af 15. juni 1979 med Norge om afgrænsingen af den kontinentale sokkel i området mellem Færøerne og Norge om grænsen mellem fiskeriteritoriet ved Færøerne og den norske økonomiske zone« verður lýstur at galda í Føroyum.

2. viðgerð 24. februar. Uppskotið varð samtykt við 20-0 atkvøðum.

F.L.1500-5-1.

---

# 58. Uppskot til samtyktar viðvíkjandi heimastýrislógini.

Ár 1984, mikudagin 22. februar legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Marknaðarnevnd løgtingsins verður álagt at taka upp samráðingar við danskar ríkismyndugleikar um at slíkar umskipanir verða gjørdar í heimastýrislógini:

1) at føroyskur heimarættur sambært tjóðskaparregluni verður staðfestur,
2) at móðurmálið verður einasta viðurkenda mál í almennum viðurskiftum í Føroyum,
3) at føroyingar fáa føroyskt pass,
4) at øll uttanríkismál okkara koma á føroyskar hendur,
5) at føroysku fólkatingssessirnir verða avtiknir,
6) at stovnað verður føroyskt sendiharraembæti við sæti í Keypmannahavn.

**Greinagerð:**
Bæði í tingsetuni 1980 og 1981 hevði tjóðveldisflokkurin uppskot við nakað sama innihaldi sum hetta. Í tingsetuni 1980 sovnaði málið í nevnd, í tí seinnu varð tað felt.

Orsøkin til at flokkurin nú aftur leggur at kalla sama uppskot fram er tann, at tey brek, ið tá vóru og altíð høvdu verið á heimastýrislógini, í teimum farnu trimum árunum, eru vorðin upp aftur sjónskari og grefligari.

Sambært heimastýrislógini er føroyska tjóðin ikki til, men føroyingur er hvør tann einasti danski ríkisborgari, sum tekur bústað í Føroyum. Tað skuldi verið eyðsýnt, at vilja vit føroyingar hava virðing fyri okkara tjóðskapi, kunnu vit ikki lata okkum slíka skilgreining lynda. So fáment tjóð okkara er, hevur tað alstóran týdning, at tað bert eru føroyingar og eingir aðrir, ið eiga heimarætt í landi okkara. Tá ið tað hevur borið til álendingum, sum tó bert eru svenskur minniluti í Finlandi, at hava álendskan heimarætt staðfestan í stjórnarskipan síni, skuldu vit føroyingar, sum eru serstøk tjóð, ikki átt minni rætt til hetta sama.

Her skal serstakliga verða bent á, at EEC-fyritøkur, nú Danmørk er komin upp í henda felagsskap, við donskum ríkisborgararætti í Føroyum lættliga kunnu fáa sama rætt í Føroyum sum vit føroyingar sjálvir.

Tí mæla vit til, at føroyskur heimarættur sambært tjóðskaparregluni verður staðfestur. Hesin heimarættur verður tá m.a. treyt fyri valbæri og valrætti, fyri at fáa tænastumannastarv, fyri atvinnurætti og fyri rætti til at eiga fastognir.

Ei heldur kunnu vit lata okkum lynda, at útlendskt mál skal hava sama rætt í landi okkara sum okkara egna móðurmál, soleiðis sum ásett er í heimastýrislógini, og at vit føroyingar uttanlands skulu ganga við útlendskum passi.

Tí mæla vit til, at móðurmálið verður einasta viðurkenda mál í almennum viðurskiftum í Føroyum. Har fyri er tað sjálvsagt at vit læra onnur mál bæði væl og virðiliga, men óneyðugt er at skila slíkt til í landsins stjónarlógum.

Somuleiðis mæla vit til, at føroyingar fáa føroyskt pass, soleiðis at vit, tá ið vit ferðast í øðrum londum, eru føroyingar og ikki nakað annað.

Hjá fáum londum hava uttanlandsviðurskifti so stóran týdning sum hjá okkum. Hetta hongur uppi í tí vinnulívsmynstri, ið vit hava, við eintáttaðum vinnulívi og tí upp á seg stórum uttanlandshandli, og eisini við teirri fiskiveiðu, ið vit reka í annara landa sjógvi, og aðrir reka hjá okkum.

Har næst er at nevna, at danskur uttanríkispolitikkur aftan á limaskap Danmarkar í EEC í mongum verður stjórnaður av hesum felagsskapi, eisini slíkur uttanríkispolitikkur, ið viðkemur okkum føroyingum, hóast vit eru uttan fyri henda felagsskap.

Í longdini ber ikki til at røkja føroysk áhugamál mótvegis øðrum londum undir teirri skipan, at annað land og nú eitt av EEClondunum, skal hava tey í hondum. Tí mæla vit til, at øll okkara uttanríkismál koma á føroyskar hendur.

Núverandi stjórnarskipan tillutar okkum tveir sessir í danska fólkatinginum. Vit duga ikki at síggja nakra nyttu í hesum sessum. Viðskifti okkara við danskar ríkismyndugleikar verða hagreidd millum føroyska landsstýrið og donsku ríkisstjórnina (forsætisráðið fyrst og fremst) og ikki millum løgting og fólkating.

Tí mæla vit til, at hesir sessir nú verða avtiknir.

Í sambandi við hesa avtøku fólkatingssessana og í sambandi við yvirtøkuna av uttanríkismálum verður neyðugt at stovnseta serstakt føroyskt sendiharraembæti, og mæla vit til at hetta fær sæti í Keypmannahavn.

— — —

Sum árini eru liðin síðan heimastýrislógin kom í gildi, er tað komið alt meir og meir fram í ljósið, at tann karmur, ið henda lóg setti okkum, hevur verið ov trongur.

Nøkur ítøkilig dømi kunnu nevnast.

Tó at vit formliga eru uttan fyri EEC-limaskapin eru vit sum lutur í danska EEC-ríkinum hálva vegna drignir inn í henda felagsskap. Soleiðis sum marknaðarnevndin í áliti sínum í tingmáli nr. 31/1980 bendi á, eru umstøður okkara broyttar aftan á at Danmørk er farin upp í henda felagsskap, m.a. av tí at Danmørk hevur latið frá

sær avgerðarrættin í nógvum málum, har ímillum í uttanríkismálum.

Tvær ella tríggjar ferðir hevur løgting okkara lýst okkum uttan fyri allar hermálsligar samgongur og avsagt alt útlendskt hervald í landi okkara, men kortini eru vit alsamt innlimaðir í hernaðarsamgongu og kortini hava vit hervald í landi okkara.

Vit hava søkt um javnbjóðis limaskap í Norðurlandaráðnum, men kunnu ikki fáa slíkan, tí okkara ófrælsa stjórnarskipan, heimastýrislógin, forðar okkum í hesum sjálvsagda rætti.

Løgting okkara hevur tvær ferðir samtykt at undirgrund okkara og havbotnur skulu yvirtakast, men nú er tað framkomið, at okkara egna stjórnarskipan, ið vera skuldi, nevniliga heimastýrislógin, er ikki so fræg, at hon vissar okkum rætt til egnu ognir.

Samanumtikið er áskoðan tjóðveldisfloksins tann, at broytingar í stjórnarviðurskiftum okkara gerast bráðneyðugar, bæði av tjóðskaparligum, politiskum og búskaparligum orsøkum, og at tað má sigast vera í evstu løtu, at løgtingið tekur alt hetta mál til gjølliga viðgerð.

Ein leiðin burtur úr óførinum er tann, ið tjóðveldisflokkurin við hesum uppskoti mælir til at ganga, nevniliga at vit taka upp samráðingar við danskar ríkismyndugleikar um slíkar broytingar í heimastýrislógini,

*at* føroyskur heimarættur sambært tjóðskaparregluni verður staðfestur,

*at* móðirmálið verður einasta viðurkenda mál í almennum viðurskiftum okkara,

*at* vit fáa føroyskt pass,

*at* øll uttanríkismál okkara koma á føroyskar hendur,

*at* føroysku fólkatingssessirnir verða avtiknir,

*at* stovnað verður føroyskt sendiharraembæti við sæti í Keypmannahavn.

1. viðgerð 24. februar. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 8. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av tjóðveldisflokkinum tann 22. februar 1984 og undir 1. viðgerð tann 24. februar 1984 beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur á fundi tann 24. apríl 1984 viðgjørt málið og býtt seg í tríggjar minnilutar.

Minnilutin (Hilmar Kass, Jógvan Sundstein og Olaf Olsen) setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan 1. Olsen og Jørgen Thomsen) tekur ikki undir við uppskotinum.

Minnilutin (Petur Reinert og Karin Kjølbro) tekur undir við uppskotinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 8. mai. Atkvøðugreiðslan á seinni fundi sama dag. Uppskotið fall við 9-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 101-11.

---

# 59. Uppskot til matvørulóg.

Ár 1984, týsdagin 6. mars legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja tað í viðlagda áliti framsetta uppskot til løgtingslóg um matvørur v.m.

**Viðmerkingar:**
Í 1977 setti landsstýrið eina nevnd at gera uppskot til eina føroyska matvørulóg.

Í nevndina vóru valdir hesir limir: Jákup Mørkøre, deildarleiðari, Dánjal J. Bærentsen, djóralækni, Høgni Debes Joensen, landslækni, Nepper Christensen, landfúti, Jóstinus Olsen, djóralækni, og Sigrid Dalsgaard, formaður í Brúkarafelagnum.

Nevndin handaði landsstýrinum viðlagda álitið við viðmerkingum í juni mánað 1981.

Lógin er ein sokallað rammulóg, sum gevur landsstýrinum heimild til við kunngerðum at áseta reglur á øllum økjum, sum hava við matvørur v.m. at gera.

Ongar av hesum mongu kunngerðum eru gjørdar, og eftir § 54 í lógini verður skotið upp, at landsstýrið fær heimild ti at seta lógina í gildi so við og við, sum kunngerðir verða gjørdar á teimum ymisku økjunum.

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá ymsum stovnum og felløgum, men hava ummælini ikki givið landsstýrinum høvi at gera nakra týðandi broytingar í nevndaruppskotinum.

Eftir uppskotinum skal lógin fyrisitast av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Eykaútreiðslurnar hjá starvsstovuni av fyrisiting av lógini berða mettar til eina góða mió. kr., haraftrat kemur eykaarbeiði hjá tollvaldinum at kanna skjøl og váttanir, ið skulu fylgja við imfluttum matvørum v.m.

Landsstýrið tekur undir við uppskotinum frá nevndini við omanfyri tilskilaðu broyting og leggur fram uppskot til lóg um matvørur vísandi til uppskotið í nevndarálitinum.

Sí skjal 11.

1. viðgerð 12. mars. Málið varð beint í lóganevndina, sum 8. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er lagt fram landsstýrinum 6. mars 1983 og undir viðgerð 12. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Lóganevndin hevur viðgjørt málið, men við tað at hetta er eitt stórt og rúgvusmikið mál, sær nevndin seg ikki føra tyrí at avgreiða málið eftir so stutta tíð, og mælir nevndin til, at lóganevndin heldur fram sum millumtinganevnd hesum máli viðvíkjandi og setir sostatt fram

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Lóganevndin heldur fram sum millumtinganevnd til ólavsøkutingsetuna til viðgerð av løgtingsmáli nr. 59/1983: Uppskot til matvørulóg.

2. viðgerð 9. mai. Uppskotið til samtyktar samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 916-6-1.

---

# 60. Løgtingslóg um bygdamenning.

Ár 1984, friggjadagin 24. februar legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**uppskot**
**til**

**løgtingslóg um bygdamenning.**

**§ 1.** Hvørjum tí skattgjaldara, ið setir parta- ella lutapening í vinnulívsfeløg í vinnuliga tilaftirskomnum bygdum, og sum hava tað til endamals at fremja

**lagtingslov om bygdeudvikling.**

**§ 1.** Det er tilladt enhver skatteyder, der investerer i aktieselskab — eller andelskapital i erhvervsforetagender på erhvervsstilbagestående bygder, og som har det

vinnuliv bygdanna, skal vera heimilt at draga frá skattskyldugu inntøku síni tilsvarandi upphædd, tó onga tíð meira enn 10.000 kr. árliga.
*2. stk.* Selir parta- ella lutaeigari part ella lut sín innan fyri 7 ár, verður hann skattskyldugur av upphædd, ið svarar til upphæddina, ið áður var skattfræls.

**§ 2.** Eftir tilmæli fiskaðarstovunnar og menningargrunsins kunnger landsstýrið skrá yvir tær bygdir, ið koma undir § 1 í hesi lóg.

**§ 3.** Landsstýrinum er heimilt saman við fíggjarnevndini úr landskassanum at seta upp í 20% av parta- ella lutapeninginum í tey bygdavinnulívsfeløg, ið umrødd eru í § 1 í hesi lóg.
*2. stk.* Í slíkum førum skal landsstýrið í minsta lagi hava ein nevndarlim í viðkomandi felagi.

**§ 4.** Eftir samráð við fíggjarnevndina setir landsstýrið í reglugerð nærri fyrimæli um útinning lógarinnar.

**§ 5.** Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

til formål at støtte bygdernes erhvervsliv, at fradrage fra den skattepligtige indtægt et tilsvarende beløb, dog ingensinde mere end 10.000 kr. årlig.
*Stk. 2.* Sælger aktieselskabs- eller andelshaver del eller andel indenfor 7 år, skattes han af det beløb, der svarer til det beløb, der tidligere var fritaget for skat.

**§ 2.** Efter udtalelse fra Fiskaðarstovan og Menningargrunnin offentliggør landsstyret fortegnelse over de bygder, der henføres under § 1 i denne lov.

**§ 3.** Landsstyret er bemyndiget til sammen med finansudvalget af landskassens midler at sætte op til 20% af aktieselskabets eller andelsbeløbene i de bygdeerhvervsforetagender, der er omtalt i § 1 i denne lov.
*Stk. 2.* I sådanne tilfælde skal landsstyret eje mindst en af bestyrelsesmedlemmerne i vedkommende selskab.

**§ 4.** Efter samråd med finansudvalget fastsætter landsstyret i reglement nærmere regler om administrationen i henhold til denne lov.

**§ 5.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Tá ið [illegible]sflokkurin í tingsetuni 1983 legði fram sama uppskot

sum nú aftur verður lagt fyri tingið, benti, flokkurin á ta sannroynd, at av broyttum vinnulívsmynstri hevði m.a. staðist tað, at mong bygdin, ið áður hevði havt hampilig vinnulívskor, nú var komin til afturs við minkandi vinnulívsmøgulcikum og minkandi fólkatali. Ein støðug flyting fólks frá hesum bygdum var tí farin fram.

Henda gongd hevur staðið við. Vissuliga er ein táttur í bygdamenningarpolitikkinum at bøta um samferðslulíkindini — við vega- og tunnilsgerð, og við skipa- og flogsambandi. Men slíkt er sjálvsagt ikki nóg mikið, ja — verður einki annað samtíðis gjørt — kann slíkt í veruleikanum elva av sær upp aftur større flyting av fólki frá hesum bygdum.

Tjóðveldisflokkurin metir hesa gongd við framhaldandi flyting av fólki frá hesum bygdum vera skeiva, og heldur, at tað eigur at vera ein tátturin í búskaparpolitikki okkara sum mest at varðveita hesar bygdir og at stimbra menning teirra. Ein høvuðstreytin fyri hesum er at skapa vinnu- og inntøkulíkindi í sjálvum bygdunum. Tað er hetta, ið hjálagda uppskot miðar ímóti, sum var felt í seinastu tingsetu, men nú aftur verður lagt fram.

Eftir uppskotinum skal tað vera skattgjaldara heimilt at draga frá skattskyldugu inntøku síni ávísa upphædd, ið svarar til tann pening, ið hann setir sum parta- ella lutapening í vinnulívsfelag í vinnuliga tilaftirskomnum bygdum, sum hava tað til endamáls at fremja vinnulívið har. Hin skattafrii peningur er í uppskotinum settur til í mesta lagi 10.000 kr. árliga.

Skuldi tað nú hent, at slíkur parta- ella lutaeigari innan fyri 7 ár selir part ella lut sín, eigur hann ikki at fáa skattligan fyrimun av slíkari sølu, men skal tá hin áður skattfrælsa íløga koma undir skattskyldu.

Tað ber ikki til í lóg at skilgreina hvørjar bygdir, ið skulu teljast vera tilaftrurskomnar, og verður slíkt altíð ein metingarspurningur. Mælt verður tí til, at landsstyrið eftir tilmæli ídnaðarstovunnar og menningargrunnsins ger skrá yvir tær bygdir, ið koma undir hesi lógarfyrimæli.

Harnæst metir tjóðveldisflokkurin tað vera rætt, at landsstýrið í hesi lóg saman við fíggjarnevndini fær standandi heimild til úr landskassanum at seta upp í 20% av parta- ella lutapeningunum í slík bygdavinnulívsfeløg. Í slíkum førum skal landsstýrið í minsta lagi hava ein nevndarlim í viðkomandi felagi.

. Nærri reglur um útinning lógarinnar setir landsstýrið í samráð við fíggjarnevndina.

1. viðgerð 6. mars. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av tjóðveldisflokkinum tann 24. februar 1984 og undir 1. viðgerð 6. mars beint í fíggjarnevndina.

Fyriliggjandi mál er áður lagt fram av tjóðveldisflokkinum tann 14. februar 1983 og varð undir 1. viðgerð 17. februar 1983 beint í fíggjarnevndina. Fíggjarnevndin avgreiddi álit til løgtingið 9. mai 1983.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í 5 minnilutar.

Minnilutin (Ivan Johannesen, Øssur Dam Jacobsen og Sv. Áge Ellefsen) vísir til støðutakan sína í álitinum frá 9. mai 1983, har ikki varð tikið undir við málinum. Nevndi minniluti ásannaði, at positivar hugsanir eru í uppskotinum, men vísir nevndi minniluti til meginvansarnar viðvíkjandi skráseting, at skattareglurnar eru í eini lóg, sum uppskotið, og at umsitingin av lógini verður trupul.

Ein annar minniluti (Hilmar Kass) vísir til støðutakan Asbjørn Joensens í álitinum frá 9. mai 1983 og ásannar, at tey sjónarmið, sum liggja til grund fyri uppskotinum eru ov týðandi og neyðug, um nøkur menning skal gerast í teimum meiri fjarskotnu pørtunum í landinum. Tað er tí umráðandi at fáa lýst, hvørjir partar av landinum talan kann verða um. Minnilutin kann tó ikki taka undir við fyriliggjandi uppskoti um skatligar fyrimunir, men er av teirri áskoðan, at umhugsað verður at geva hesum økjum fyrimunir í stuðli og lánum frá almennum grunnum (Menningar- og Idnaðargrunninum). Eisini er tað umhugsunarvert at taka til eftirtektar somu lagaligu fígging til ídnað á hesum plássum, sum hana, ið veitt verður landbúnaðinum. Tikið verður undir við tí setningi, at landsstýrið í sínum arbeiði viðvíkjandi bygdamenningarspurningunum ger neyðuga kanning til skráseting av bygdum, ið kundu verið umfataðar av møguligum lógaruppskoti hesum viðvíkjandi.

Ein triðji minniluti (Atli P. Dam) førir fram:

Ásannast má, at bygdamenningin ikki er komin í fasta legu og at stórur tørvur er á at fremja tiltøk, sum kunnu seta ferð á útbyggingina, eisini í heilt smáum økjum. Kortini metir minnilutin, at meginvansin við at samtykkja fyriliggjandi uppskot er skrásetingin av, hvør skal koma undir lógina. Heldur ikki heldur minnilutin, at bygdamenning eigur at grundast á skattaavskrivingar, hesum er ov

mikið av frammanundan. Tí eiga reglur at verða gjørdar, har almennur stuðul beinleiðis verður stýrdur út á økini, har tørvur er á vinnuskapandi íløgum. Samstundis mugu beinanvegin takast stig til at avmarka galdandi avskrivingarreglur.

Fjórði minnilutin (Ove Mikkelsen) mælir til at samtykkja uppskotið.

Fimti minnilutin (Juul Jacobsen) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 7. mai. § 1 fall við 7-0. Málið sostatt burturdottið.

---

# 61. Broyting í løgtingslógini um húsalánsgrunn.

Ár 1984, fríggjadagin 24. februar legði Finnbogi Isaksen, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um húsalánsgrunn.**

§ 1. Í løgtingslóg nr. 97 frá 1. november 1978 um húsalánsgrunn verða gjørdar hesar broytingar:

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om boligfond.**

§ 1. I lagtingslov nr. 97 af 1. november 1978 om boligfond foretages følgende ændringer:

*1.* § 8, 1. stk. verður orðað soleiðis:

»Til nýbygging av sethúsum og íbúðum kann grunnurin veita lán upp til 90% av metingarvirðinum til sethús og íbúðir, ið hava upp til 120 m² av innrættaðari gólvvídd. Grunnurin kann veita upp til 40% av metingarvirðinum til sethús og íbúðir, ið hava meira enn 120 m² av innrættaðari gólvvídd. Hús og íbúðir størri enn 150 m² fáa onki lán úr Húsalánsgrunninum.«

*2.* Í § 11 verða sett sum nýggj 2. og 3. stk.:

»2. stk. Avgjøldini, tað er rentur og avdráttur, laga seg eftir inntøkuni hjá lántakaranum. Miðað verður ímóti, at lántakari ikki skal nýta meira enn 20% av síni inntøku til rentur og avdráttir av húsum ella íbúð. Landsstýrið setir nærri reglur fyri innkrevjingarháttinum.

3. stk. Grunnurin fær á hvørjum ári frá líkningarvaldinum upplýsingar um inntøkuna árið fyri hjá øllum lántakarum og hesar upplýsingar verða nýttar til útrokning av avgjøldum. Inntøkan er í hesum føri skattskylduga inntøkan uttan frádrátt av rentum. Hjá persónum, sum sjálvstøðugt reka ella luttaka í fríari vinnu av einumhvørjum slag, er inntøkan skattskylduga inntøkan uttan frádrátt av rentum og harumframt uttan frádrátt av avskrivingum, sum ikki

*1.* § 8, stk. 1 affattes således:

»Til opførelse af beboelseshuse og boligejendomme kan fonden yde lån indtil 90% af vurderingen til beboelseshuse og lejligheder, der har indtil 120 m² indrettet gulvareal. Fonden kan yde lån indtil 40% af vurderingen til beoboelseshuse og lejligheder, der har mere end 120 m² indrettet gulvareal. Boligfonden yder ikke lån til huse og lejligheder, der er større end 150 m².«

*2.* I § 11 indgår som nyt stk. 2 og stk. 3:

»Stk. 2. Bidragene, d.v.s. renter og afdrag, reguleres efter låntagerens indkomst. Det tilstræbes, at låntager ikke skal anvende mere end 20% af sin indkomst til forrentning og afdrag på beboelseshus eller lejlighed. Landsstyret fastsætter de nærmere regler for indkrævningsmåden.

Stk. 3. Fonden modtager hvert år fra ligningsmyndigheden oplysninger om alle låntageres indkomster året før, og disse oplysninger anvendes til beregning af bidragene. Indkomsten er i denne forbindelse den skattepligtige indkomst uden fradrag af renter. For personer, der selvstændigt driver eller deltager i frit erhverv af en hvilken som helst slags, er indkomsten den skattepligtige indtægt uden fradrag af renter og derudover uden

kunnu rúmast í rakstraravlopinum av hvørjari vinnu sær, smb. løgtingslóg nr. 52 frá 29. desember 1971 um skattligar avskrivingar.«

**3.** § 12 verður orðað soleiðis:

»Afturgjaldstíðin kann ikki vera longri enn 40 ár og ikki stytri enn 10 ár, uttan so at lántakarin ynskir at stytta hana.

2. stk. Tá eini hús ella ein íbúð er prioriterað, roknar grunnurin út, hvat hægsta og lægsta gjald hevði verið, um lánið varð afturgoldið yvir 40 ella 10 ár. Tey framkomnu tølini verða nýtt sum hámark og lágmark fyri avgjøldunum.«

*4.* § 4 verður orðað soleiðis:

»Árliga verður avsettur stuðningur á Løgtingsins fíggjarlóg til grunnin. Fíggjarárini 1984/85 til og við 1988/89 verða hesar upphæddir avsettar:

| | |
|---|---|
| 1984/85 ..... | 30 milj. kr. |
| 1985/86 ..... | 35 milj. kr. |
| 1986/87 ..... | 40 milj. kr. |
| 1987/88 ..... | 45 milj. kr. |
| 1988/89 ..... | 50 milj. kr.« |

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

fradrag af afskrivninger, der ikke kan rummes i driftsoverskuddet i hvert erhverv for sig, jfr. lagtingslov nr. 52 af 29. december 1971 om skattemæssige afskrivninger.«

*3.* § 12 affattes således:

»Tilbagebetalingstiden kan højst andrage 40 år og mindst 10 år, medmindre låntageren ønsker en kortere tilbagebetalingstid.

Stk. 2. Når en bolig eller en lejlighed er prioriteret, beregner fonden, hvad højeste og laveste bidrag ville være, såfremt lånet blev tilbagebetalt over 40 henholdsvis 10 år. De således fremkomne beløb anvendes som maksimum henholdsvis minimum for bidragene.«

*4.* § 4 affattes således:

»Der afsættes et årligt tilskud til fonden på lagtingets finanslov. For finansårene 1984/85 til og med 1988/89 afsættes følgende beløb:

| | |
|---|---|
| 1984/85 ..... | 30 milj. kr. |
| 1985/86 ..... | 35 milj. kr. |
| 1986/87 ..... | 40 milj. kr. |
| 1987/88 ..... | 45 milj. kr. |
| 1988/89 ..... | 50 milj. kr.« |

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

II.

**Uppskot**
**til**
**samtyktar.**

Løgtingið áleggur landsstýrinum at seta kunngerð nr. 1 frá 2. januar 1979 um Húsalánsgrunnin í gildi aftur og samstundis seta úr gildi kunngerð nr. 68 frá 14. mei 1982 um Húsalánsgrunnin.

III.

**Uppskot**
**til**
**samtyktar.**

Løgtingið áleggur landsstýrinum og stýrinum fyri Húsalánsgrunnin við gildi frá 1. januar 1984 at rokna at hækka útlánsupphæddirnar soleiðis, at 200.000 kr. verða veittar í láni til hús og íbúðir, ið hava upp til 120 m² av innrættaðari gólvvídd, og 85.000 kr. til hús og íbúðir, ið hava millum 120 og 150 m² av innrættaðari gólvvídd.

Upphæddirnar verða í minsta lagi hækkaðar við prístalinum hvønn 1. januar.

**Viðmerkingar.**

Húsalánsgrunnurin varð stovnaður sambært løgtingslóg frá 1964. Tey fyrstu árini var útlánsupphæddin lítil, men hon vaks so við og við.

Í 1978 samtykti løgtingið eina nýggja lóg fyri Húsalánsgrunnin. Hon kom í gildi 1. juli sama ár. Høvuðsendamálini við tí broyttu lógini vóru, at grunnurin fyrst og fremst skuldi veita lán til »vanlig« sethús (t.v.s. ikki til stór hús), og at afturgjaldstíðin skuldi vera misjøvn alt eftir inntøkuni hjá lántakaranum.

Við løgtingslóg frá 11. mai 1982 varð lógin um Húsalánsgrunnin broytt. Tann nýggja samgongan hevði ikki somu áskoðan á útlánspolitikkin hjá grunninum sum undanfarna samgonga. Høvuðsbroytingarnar frá 1982 vóru, at afturgjaldingartíðin skuldi vera eins long fyri øll, at markini fyri, hvussu stór hús ella íbúðir kundu vera, hóast munandi lán varð veitt, vórðu gjørd so rúmsátt, at tað hevði verið eins frægt við ongum mørkum.

Tjóðveldisflokkurin heldur, at lógin frá 1978 var munandi betri enn tann núgaldandi. Skotið verður tí upp at venda aftur til lógina frá 1978 við einstøkum broytingum.

Viðmerkingar til tey einstøku pettini í lógaruppskotinum:

*Að § 1, pkt. 1:* Eftir hesum verður tað største lánið goldið til hús upp til 120 m² av innrættaðari gólvvidd. Munandi minni verður veitt

størri húsum. Eins og í galdandi lóg verður mælt til, at hús og búðir, størri enn 150 m², skulu einki lán fáa úr grunninum.

*Að § 1, pkt. 2:* Í 1982 varð tann broyting gjørd, at øll lán skuldu vera annuitetslán, ið skuldu gjaldast aftur eftir 28 árum. Skotið verður upp at venda aftur til ta fyrru regluna um, at avgjøldini (rentur og avdráttur) skulu laga seg eftir inntøkuni hjá skattgjaldaranum, grundað á upplýsingar frá líkningarvaldinum.

*Að § 1, pkt. 3:* Eftir lógini frá 1978 kundi afturgjaldstíðin liggja ímillum 40 og 20 ár, alt eftir inntøkuni hjá lántakaranum. Her verður skotið upp, at afturgjaldstíðin kann liggja millum 40 og 10 ár.

Í 1978 varð roknað út, at um grunnurin veitti 500.000 kr. í láni eftir tí nýggju skipanini, og lánið varð afturgoldið yvir 40 ár, kom lántakarin tilsamans at gjalda umf. 1,1 milj. kr. Var lánið hinvegin ímóti annuitetslán -- sum er nýgaldandi skipan -- kom lántakarin at gjalda tilsamans umf. 1,4 milj. kr. aftur.

*Að § 1, pkt. 4:* Í lógini frá 1978 stóð, at í [illegible] skuldi peningurin avsetast á fíggjarlógini til grunnin, tað [illegible] 10 milj. kr. Hesin upphædd hevur síðani staðið á hvørjari fíggjarlóg.

Mett verður, at við vaksandi prísum og lønum er hesin upphædd nógv ov lítil, serliga um grunnurin skal hava nakran stuðul at menna seg og luttaka við stórri partur [illegible] av sethústum og íbúðum.

Skotið verður til upp at seta av tilsamans [illegible] 5 árini.

*Að II: Uppskot til samtykt:* Í lógini [illegible] broytt í 1982, varð kunngerðin um grunnin [illegible] ásetingarnar í kunngerðini um, hvat [illegible] gólvvidd, broyttar soleiðis, at tað [illegible] almennum reglustaðlinum. Í sínum [illegible] m.a. um grunnsins luttøku í [illegible]

Skotið verður upp at seta [illegible]

*Að III: Uppskot til samtykt:* Í [illegible] smærru húsini hækkað úr 60.000 upp [illegible] størri enn 120 m² framvegis fingu 60.000 kr.

Í 1982 varð hetta broytt, soleiðis at hús upp til [illegible] kr., hús 120 til 135 m² 100.000 kr. og hús [illegible] 150 m² 60.000 kr.

Mælt verður til hetta at nýta tvey mørk í [illegible] lánsupphæddirnar, soleiðis at hús upp til 120 m² skulu fáa 200.000 kr. í láni og hús 120 til 150 m² 85.000 kr. í láni.

1. viðgerð 6. mars. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 6. apríl legði fram soljóðandi

## Áll

Málið varð lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 24. februar 1984 og undir 1. viðgerð tann 6. mars beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í eitt meirilutu og tveir minnilutar.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin Ove Mikkelsen og Adolf Hansen) tekur undir við málinum.

Minnilutin (Atli Dam) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 11. apríl 1984. § 1 fall við 15 ja-atkvøðum, 15 atkvøddu ikki, 2 vóru burturstaddir. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

| | |
|---|---|
| Ja atkvøddu: | Juul Jacobsen, Adolf V. Hansen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Jákup Lindenskov, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen. |
| Atkvøddu ikki: | Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Arne Ziskasen, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Olaf Olsen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Jákup Lindenskov, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein. |
| Burturstaddir: | Agnar Nielsen, Óli Breckmann. |

Uppskotini til samtyktar II og III fullu bæði við 14-0 atkvøðum.

# 62. Skipaumvælingar í Føroyum.

Ár 1984, fríggjadagin 9. mars legði Jørgen Thomsen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt at seta nevnd við serkønum fólki til at koma við tilmæli til løgtingið um framtíðar skipasmíð útfrá tí, sum ført er fram í viðmerkingunum til hesa samtykt.

**Viðmerkingar:**
Mangan verður ført fram at vit føroyingar liva av tí fiskiflota vit hava í hesum samfelag. Tey umleið 225 fiskiskipini, sum eru í rakstri skapa harvið fíggjarligt støði undir øllum samfelagnum. Samtíðis verður størsti partur av fíggjarorku landsins bundin av hesari vinnu.

Tað er tí sera umráðandi at sum mest fæst burturúr hesum okkara veiðitólum, bæði á ein og annan hátt og at sum mest kemur fólkinum øllum at gagni.

Eftir upplýsingum ið fyriliggja, er nógv ið bendir á eina skeiva gongd í sambond við umvælingar, umbyggingar og tannastuveitingar til fiskiflotan og onnur skip okkara.

Í 1983 brúktu føroyingar fyri umleið kr. 140 miljónir uttanlands til umbyggingar og umvælingar, meðan føroyskar skipasmiðjur einans hava umvælt fyri kr. 10,5 miljónir fyri útlendingar.

Av hesum 10,5 miljónum krónum eru tær 7,5 miljónu krónu umvælingar av russaraskipum.

Serstakliga seinni árini hevur verið roynt at finna alternativ – aðrar møguleikar fyri fiskivinnuna, av tí at tað tykist alsamt trongligari um trogið, sum eitur fiskivinna.

Vit missa fiskileiðir bæði nær og fjar, samstundis sum menn gerast ræddir, tí at grunnar okkara verða neyðfiskaðir okkum til óbótaligan skaða.

Tað gerst tí alneyðugt, at sum mest av øllum arbeiði verður gjørt herheima hjá okkum sjálvum.

Væl av peningi verður nýttur til at finna fram til góðsking av fiskavørum og aðrari framleiðslu í samband við fiskivinnuna. Eisini verður roynt at útbyggja hetta samfelag við skipum til royndarfiskiskap eins og mangt annað verður roynt.

Alsamt fyri at vit skulu fáa sum mest burturúr fiskiflotanum til gagns fyri samfelagið alt.

Tað má eisini haldast landsbúskaparliga skilagott, at so nógv av okkara egna verður smíðað og framleitt heima hjá okkum sjálvum. Her hevur ætlandi ein skeivleiki tikið seg upp, við tað at vit lata aðrar fara við peningi, sum kundi verið í landinum, tí at skip okkara í so stóran mun verða viðgjørd uttanlands.

Føroyingar eru førir fyri at smíða og gera alt við skip okkara sjálv um rætt varð alborið. Seint á sumri 1977 varð ein starvsnevnd sett av landsstýrinum til at kanna viðurskiftini hjá ídnaðinum í Føroyum.

Umleið 2 ár seinni kom drúgvt álit frá hesari nevnd og almannakunngjørt. Har verður m.a. sagt í samband við skipasmiðjurnar:

> »Vandi er tí fyri at skipasmíð yvirhøvur verður fyri ógvuliga harðari kapping næstu árini, bæði prískapping og kapping um figgjartreytir.«

Tað er uttan iva rætt, sum starvsnevndin sipar til her, at tað mest eru figgjartreytirnar, sum tær útlendsku skipasmiðjurnar kunnu bjóða, sum gera at menn leita burtur í lond fyri at fáa síni skip viðgjørd.

Ein fær líkasum fatan av, at lættari kemst ígjøgnum við at fáa byggilán eins og sjálva fíggingina uttanlands.

Tað er tí mangt, ið bendir á, at tað er skeivur peningapolitikkur herheima, sum ger at so nógv verður smíðað uttanlands hóast at roynt hevur verið at hækka studning og veðhaldsskyldur til arbeiðir gjørd herheima.

Vanliga verður ímillum ein helming og 2/3 av umvælingarkostnaðinum goldið í lønum.

Tá so umvælingar av skipum eru gjørdar uttanlands fyri umleið 140 miljónir kr. í 1983, er hetta tað sama sum 70-80 miljónir krónur í arbeiðsløntum ella ímillum 300-400 arbeiðspláss við góðari løn.

Javnaðarflokkurin metir tí, at her verður nakað álvarsligt gjørt, so at sum mest fyri ikki at siga allur hesin peningur kundi komið samfelag okkara betri at gagni.

Føroyskar skipasmiðjur hava gjørt tær rovndir, at vael ber til at endurútbúgva t.d. fiskimenn til sveisaran og skipasmiðir

Tað er tørvur fyri útbúnum folki a ti tekniska økinum. Har er handverkaralæran mangan eitt grundarstøði fyri at farast kann i framhaldandi útbúgving. Hugsa bara um mogutleikarnar hjá t.d. maskinlærlingum.

Við tað at vit skapa nógv handverkara arbeiðspláss i hesum samfelagnum, geva vit ungdómunum rimari útbúgvingarmøguleikar, og harvið fæst meira av ungdómunum i handliga vinnu

Samstundis vildi trýstið á skúlunum i hesum samfelag minkað.

Tað er mangan komið fram at ungdómurin heldur i við skúlagongdini sum longst, tí torført er at koma i handligt arbeiði seinni er mangan torført at fáa handverkaraútbúgving.

Tað eru ikki bert tey, ið starvast við sjálvt skipasmiðið, ið vildu fingið ágóðan, men tænastufyritøkur við. t.d. vildu farmaskipini flutt tilfarið, ið brúkast skal, sum so altur kastar av sær økt lossing ararbeii o.a. arbeiði herheima.

Útfrá hesum heldur Javnaðarflokkurin tað vera neyðugt at seta eina kanning í verk, og mælir tí til at sett verður nevnd við sakkønum fólki til at koma við tilmæli til tingið útfrá hesum sjónarmiðum:

1. Hvør er orsøkin til at føroysk skip í so stórum tali verða umvald uttanlands?
2. Eru føroysku skipasmiðjurnar nóg kappingarførar?
3. Hvat kann gerast fyri at endurútbúgva fólk til skipasmiðjuarbeiði?

Flokkurin setir tí fram uppskot til samtyktar samsvarandi hesum.

1. viðgerð 12. mars. Málið vard beint í lóganevndina, sum 1. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av Javnaðarflokkinum tann 9. mars 1984 og við 1. viðgerð tann 12. s.m. beint í lóganevndina.

Eftir uppskotinum verður mælt til at seta eina nevnd við sakkønum fólki til at koma við tilmæli til tingið um framtíðar sjónarmið um framtíðar skipasmíð út frá fylgjandi sjónarmiðum:

1) Hvør er orsøkin til, at føroysk skip í sostórum tali verða umvæld uttanlands?
2) Eru føroysku skipasmiðjurnar nóg kappingarførar?
3) Hvat kann gerast fyri at endurnýbúgva fólk til skipasmiðjuarbeiði?

Nevndin hevur viðtøkur mátað, og undir viðgerðini hava umboð fyri skipasmiðjur verið at funda saman við nevndini.

Til punktini 1)-3) ovanfyri skal nevndin viðmerkja fylgjandi:

*Ad 1) Hvør er orsøkin til, at føroysk skip í so stórum tali verða umvæld uttanlands.*

[illegible] verðin á [illegible], at føroyskir skipaeigarar umvældu og umbygdu skip uttanlands í 1983 fyri umleið 140 mio. kr., medan útlendingar bert umvældu fyri 10,5 mió. kr. í Føroyum. Nevndin hevur fingið upplýst, at føroysk skip hava fingið umbyggingar og umvæligar fyri umleið 112 mio. kr. í 1983 á føroyskum skipasmiðjum. Umboðini fyri skipasmiðjurnar hava upplýst, at tað ikki er skipasmiðjukapparatsurin, sum er orsøkin til at so nógv skip latin uttanlands, tí tey meta, at føroyskir kapparatsmenn hava bundið eina part av tørru umvæligarkapparatsins, sum kundi gjørt tað ella flestu av tí umvæligarstarvinum, sum [illegible] uttanlands. Viðvíkjandi sandblástri av skipum eru upplýst, at [illegible] kr. um árið 200.000 kr. og um talan [illegible] upphæddin bert vera [illegible] sandblástrarin hevur [illegible] hevur ikki verið mett [illegible]

Reiðarar meta helst, at [illegible] at fáa arbeiðini gjørt uttanlands.

Viðvíkjandi fyrigreinum [illegible] uttanlands [illegible] fánum. Viðvíkjandi [illegible] langa tíð er [illegible] gera at framskunda arbeiðið við at [illegible] ikki er loyvt eftir handverkarasáttmálunum [illegible] framskundast við yvirtíðar arbeiði, kemur hetta at [illegible] í arbeiðslon. Í Danmark [illegible] hesta háttin [illegible] Eftir arbeiðsmannasáttmálanum er skiftivaktararbeiði loyvt. Hetta hetta í minsta lagi varar í eina viku.

Tað at flestu føroysku skipasmiðjurnar sum oftast hava ov lítið

av umvælingararbeiði ger í sjálvum sær, at tær hava ilt við at fasthalda nóg mikið av góðum fólki og at gera íleggingar í betri útgerð.

*Ad 2): Eru føroysku skipasmiðjurnar nóg kappingarførar?*

Skipasmiðjurnar meta, at tær eru nøkunlunda kappingarførar við útlendskar skipasmiðjur, sum ikki fáa »Egnsudviklings«-stuðul. Til skipaumvælingar í Føroyum verður veittur stuðul uppá 15%, meðan eingin stuðul nú er til umvælingar í útlandinum. Føroysku skipasmiðjurnar mugu tó rinda 25% í tolli av øllum tilfari og haraftrat kemur farmagjaldið. Fyri eitt umvælingararbeiði uppá t.d. 1 mió. kr., harav helvtin er tilfar, kemur ein føroysk skipasmiðja sostatt at rinda 125:000 kr. í tolli umframt farmagjaldsútreiðslur. Tollendurgjald til skipasmiðjur er bert galdandi fyri nýbygningar.

Heraftrat kann sum frammanfyri nevnt nevnast handverkarasáttmálin, sum ikki loyvir arbeiði í skiftivaktum, sum umframt at gera tað trupult at framskunda eitt umvælingararbeiði, eisini førir við sær, at føroysku skipasmiðjurnar mugu rinda meira í úrtíðargjaldi, enn tær útlendsku, sum tær skulu kappast við.

*Ad 3): Hvat kann gerast fyri at endurútbúgva fólk til skipasmiðjuarbeiði?*

Skipasmiðjurnar upplýsa, at umvælingararbeiði er fjølbroytt arbeiði og tí krevur tekniskt gott fólk. Kostnaðurin hjá skipasmiðjunum at útbúgva sveisarar er dýrur, av tí at hesir oftast eru eldri menn og fáa vanliga arbeiðsmannaløn í lærutíðini, meðan vanligir lærlingar fáa lægri løn og haraftrat fær meistarin helvtina av lønarútreiðslunum, meðan lærlingurin gongur á tekniskan skúla, endurgoldnar úr landskassanum.

Skipasmiðjurnar meta eisini, at ein av orsøkunum til, at føroysku skipasmiðjurnar eru minni kappingarførar er, at vit ikki eru nóg góðir í arbeiðsleiðslu og tí eigur at verða gjørt nakað munandi við at útbúgva og ríkisútbúgva fólk á hesum øki.

Nevndin hevur viðgjørt málið og heldur tað ikki vera neyðugt við serkønari nevnd so sum skotið er upp, men er av teirri áskoðan, at ymisk tiltøk eiga at verða gjørd til frama fyri skipasmiðjunum vælingararbeiði í Føroyum sum t.d.:

1) Avtaka 20%-gjaldið og møguliga eisini 5%-gjaldið av óvið gjørdum stáli, sveisigassi, elektrodum v.m., sjálvt um hetta eisini fær fylgjur fyri allar vanligar smiðjur v.m.

2) Handverksmeistarar og sveinar eiga at finna fram til eina skipan, sum, sum loyvir arbeiði í skiftivaktum.
3) At landskassin ikki við studningi, veðhaldan og kurstapslánum beinleiðis stuðlar skipaumvælingum í útlandinum, sum kunnu verða gjørdar í Føroyum.
4) At tørvandi peningur verður játtaður til eftirútbúgving av handverkarum og leiðarum innan skipasmiðjuarbeiði.
5) Landsstýrið áleggur landsskúlafyrisitingini at reika fyri útbúgving og eftirútbúgvingarskeiðum fyri arbeiðsfólki og leiðarum á skipasmiðjunum.

Við hesum setir meirilutin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Heitt verður á landsssstýrið at samskipa ávístu vansar, so bøtast kann um møguleikarnar fyri at fáa meiri umvælingararbeiði til føroysku skipasmiðjurnar.

2. viðgerð 8. mai. Uppskotið frá nevndini samtykt við 31-0 atkvøðum.

---

# 63. Broyting í lóg um endurnýgging av fiskiskipaflotanum.

Ár 1984, mánadagin 12. mars legði Anfinn Kallsberg, landstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Løgtingstíðindi 1983 A 50

# Uppskot til

**løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um endurnýgging av fiskiskipaflotanum.**

**§ 1.** Í løgtingslóg nr. 24 frá 1. juni 1978 við seinni broytingum um endurnýgging av fiskiskipaflotanum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1 verður sett sum nýtt:
»5. likviditetslán«.

2) Millum Deild VI og VII verður sett sum nýggj:
»Deild VI, A.

**§ 15. A.** Lán kann veitast svarandi til avdráttirnar fyrstu 2 árini av lánum úr Færøernes Realkreditinstitut til nýbygging av dekksfiskiførum.

*2. stk.* Lánið verður at tryggja við panti í viðkomandi fiskifari saman við láninum úr realkreditstovninum ella beint aftaná.

*3. stk.* Lánið er avdráttarfrítt tey fyrstu 10 árini og verður síðani at afturgjalda yvir 2 ár. Rentan verður ásett av landsstýrinum.

*4. stk.* Viðvíkjandi eigaraskifti og at skipið fer í aðra vinnu enn fiskiskap, galda reglurnar í § 4 samsvarandi.«

**§ 2.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om ændringer i lagtingslov om fornyelse af fiskerflåden.**

**§ 1.** I lagtingslov nr. 24 af 1. juni 1978 med senere ændringer om fornyelse af fiskerflåden foretages følgende ændringer.

1) I § 1 tilføjes som nyt;
»5. likviditetslån«.

2) Mellem afsnit VI og VII tilføjes som nyt:
»Afsnit VI, A.

**§ 15 A.** Lån ydes svarende til afdragene de første to år af lån fra Færøernes Realkreditinstitut til nybygning af dæksfiskerfartøj.

*Stk. 2.* Lånet skal sikres ved pant i vedkommende fiskerfartøj sammen med realkreditinstituttets prioritet eller umiddelbart derefter.

*Stk. 3.* Lånet er afdragsfrit de første 10 år og skal derefter tilbagebetales over 2 år. Renten fastsættes af landsstyret.

*Stk. 4.* Vedrørende ejerskifte og at skibet overgår i andet erhverv end fiskeri, gælder bestemmelserne i § 4 tilsvarende.«

**§ 2.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Ætlanin við hesum lógaruppskoti er at finna eina loysn, sum, hóast obligatiónirnar hjá Færøernes Realkreditinstitut verða avdrignar yvir 10 ár eins og fyri, gevur skipaeigarum ein 2 ára avdráttarskáa og sostatt fær longt lánstíðina til 12 ár. Avdráttarskáin skal gerast møguligur við, at landskassin ígjøgnum Færøernes Realkreditinstitut veitir skipaeigarunum eitt likviditetslán svarandi til teir avdráttir, ið hann annars skuldi goldið til Realin í termin 1-4.

Tað skuldi verið ein hjálp hjá skipunum at sloppið undan at goldið avdráttir av láninum til Færøernes Realkreditinstitut 4 tær fyrstu terminirnar, við tað at tað oftast er trupult við likviditetinum fyrstu tíðina.

Lánið úr landskassanum verður útgoldið til Færøernes Realkreditinstitut og tað er Færøernes Realkreditinstitut, sum vegna landskassan uppkrevur upphæddina aftur frá skipaeigarunum á sama hátt sum sítt egna lán.

1. viðgerð 14. mars. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 3. apríl 1984 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 12. mars 1984 og undir 1. viðgerð tann 14. mars beint í fíggjarnevndina.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 6. apríl 1984. § 1 varð samtykt við 24-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 25-0 atkvøðum.

3. viðgerð 10. apríl 1984. Málið endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1403-21. Lóg nr. 35 frá 3. mai 1984.

# 64. Veiting av ríkisborgararætti.

Ár 1984, fríggjadagin 9. mars legði lóganevndin fram soljóðandi

**Álit**

Landsstýrið hevur við skrivum ávikavist 14. september 1983 og 1. februar 1984 lagt lóg nr. 2 frá 25. mai 1984 og lóg nr. 4 frá 2. november 1983, báðar um veiting av ríkisborgararætti fyri løgtingið við tilmæli um, at lógirnar verða lýstar at galda í Føroyum.

Málið varð beint í lóganevndina, sum hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Asbjørn Joensen, Arne Ziskasen, Jákup Lindenskov og Agnar Nielsen) setir fram soljóðandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Lóg nr. 2 frá 25. mai 1983 og lóg nr. 4 frá 2. november 1984 um veiting av ríkisborgararætti verða lýstar at galda í Føroyum.

Minnilutin (Petur Reinert) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 16. mars. Uppskotið til samtyktar frá lóganevndini samtykt við 21-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 508-3.

# 65. Fiskiveiðiviðurskifti føroyinga í grønlendskum sjógvi.

Ár 1984, fríggjadagin 9. mars legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar.**

Løgtingið áleggur marknaðarnevndini at lata kanna hvørjar avleiðingar hin møguligi sáttmáli grønlendinga við EEC kemur at fáa fyri føroyska fiskiveiði í grønlendskum sjógvi. Kanningarúrslitið skal greiðast sum skjótast og leggjast fyri løgtingið ikki seinni enn 1. apríl komandi, og tekur tá løgtingið málið aftur til umrøðu.

**Greinagerð:**
Sum kunnugt hevur grønlendska landsstýrið gjørt sáttmála við EEC um fiskiveiði í grønlendskum sjógvi, ið skal koma í gildi, tá ið Grønland 1. januar 1985 fer burtur úr hesum felagsskapi. Enn hava tó hvørki grønlendska landstingið ella EEC-myndugleikar staðfest henda sáttmála, og ivi kann vera um, hvørt henda staðfesting fæst. Men bert tann møguleiki, at slíkur sáttmáli kann koma í gildi, má gera tað, at vit føroyingar geva hesum máli gætur.

Vit føroyingar fara sjálvsagt ikki at leggja okkum út í grønlendsk viðurskifti, men veruleikin er tann, at vit føroyingar síðan 1925 hava veitt við Grønland og enn veiða har, og tí kann eingin taka tað sum uppílegging í grønlendsk viðurskifti, at vit fáa kannað hvør støða okkara verður í grønlendskum sjógvi aftan á at hesin møguligi sáttmáli er komin í gildi.

1. viðgerð 14. mars. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 26. mars. Málið fall við 15-0 atkvøðum.

# 66. Avtøka av lógini um tvungna uppsparing.

Ár 1984, mánadagin 12. mars legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um spariskipan hjá ikki-nppihaldarum.**

**§ 1.** Løgtingslóg nr. 36 frá 15. juni 1967 um spariskipan hjá ikki-uppihaldarum, sum broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 26. mai 1971, verður sett úr gildi.

**§ 2.** Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

**lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om opsparingsordning for unge ikke-forsørgere.**

**§ 1.** Lagtingslov nr. 36 af 15. juni 1967 om opsparingsordning for unge ikke-forsørgere, som ændret ved lagtingslov nr. 18 af 26. maj 1971, ophæves.

**§ 2.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Eftir lóg nr. 36 frá 15. juni 1967 hava skattgjaldarar undir 21 ár, og sum ikki eru uppihaldarar, skyldu til at spara upp eina upphædd svarandi til landsskattin, tó hægst 6.000 kr. árliga. Helvtin av uppsparda peninginum kann dragast frá á sjálvuppgávuni. Peningurin skal standa bundin í føroyskum peningastovni, til skattgjaldarin fyllir 25 ár, men hevur viðkomandi møguleika at fáa peningin leysan aftur fyrr, um hann giftist, eigur barn, rekur sjálvstøðuga vinnu, fer í læru ella á annan hátt at útbúgva seg, og um viðkomandi flytur út av landinum.

Innistandandi í peningastovnunum av tvungnari uppsparing er í

løtuni umleið 10 mió. kr. og talið av kontohavarum umleið 3.000, ella í meðal umleið 3.300 kr. pr. tvangsuppsparara. Eftirstøðurnar av álíknaðari uppsparing eru stórar, umleið 40%.

Upphæddin upp á 6.000 kr. hevur verið óbroytt, síðani lógin kom í gildi í 1967, og skuldi upphæddin svara til lønarlagið í dag, skuldi hon verið umleið 30.000 kr.

Spariskipanin gevur nógv umsitingararbeiði, tí umframt at royna at fáa peningin inngoldnan, skulu umsóknir um at fáa pening afturgoldnan avgreiðast, og tílíkar eru fleiri av hvønn dag. Harafrat kemur arbeiði av at ansa eftir, at peningurin, sum verður drigin frá sjálvuppgávuni, veruliga er inngoldin.

Tá skipanin í núverandi líki ikki longur hevur tann stóra týdningin fyri uppsparingina og ikki hóskar saman við samtyktu lógini um samtíðarskatt, mælir landsstýrið til at avtaka lógina. Samstundis verður farið undir at kanna og skipa rentutryggingarlógina soleiðis, at kapitalspensjónir kunnu teknast við skattafyrimuni.

1. viðgerð 14. mars. Málið varð beint í lóganevndina, sum 29. mars legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 12. mars 1984 og við 1. viðgerð 14. í s.m. beint í lóganevndina.

Eftir uppskotinum verður mælt til at avtaka lóg nr. 36 frá 15. juni 1967 um spariskipan hjá ikki-uppihaldarum, tá lógin hevur víst seg ikki longur at hava nakran størri týdning og annars ikki í verandi líki hóskar saman við nýggju samtíðarskattaskipanina. Landsstýrið boðar samstundis frá, at farið verður undir at skipa rentutryggingarlógina soleiðis, at kapitalpensjónir kunnu teknast við skattafyrimuni.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Asbjørn Joensen, Agnar Nielsen, Arne Ziskasen og Petur Reinert) mælir til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

Minnilutin (Jákup Lindenskov) tekur ikki undir við uppskotinum frá landsstýrinum og mælir tinginum frá at avtaka lógina um tvingna uppsparing.

2. viðgerð 3. apríl 1984. § 1 varð samtykt við 17-2, § 2 uttan atkvøðu-

greiðslu. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 18-0 atkvøðum.

3. viðgerð 10. apríl 1984. Málið endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 430-26-1. Lóg nr. 36 frá 3. mai 1984.

---

# 67. Lóg um mál og vekt.

Ár 1984, mánadagin 12. mars legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 173 frá 28. apríl 1982 »om mål og vægt (metrologi)« verður sett í gildi í Føroyum við kongiligari fyriskipan við hesum broytingum:

1) kap. IV (§§ 14-18) gongur út.
2) Í § 19, stk. 1, gongur nr. 2 út og í stk. 3 í somu grein ganga út orðini: »statsautoriserede vejere og målere samt«.
3) Í § 20, stk. 3, gongur 2. pkt. út.

**Viðmerkingar:**

Galdandi lóg um mát og vekt nr. 65 frá 28. februar 1950 varð sett í gildi í Føroyum 1. juli 1972 og setti ríkisstýrið samstundis ein justermeistara í Føroyum at hava eftirlit við vektum og øðrum mátitólum, sum lógin fevnir um.

Nýggja lógin um mál og vekt nr. 173 frá 28. apríl 1982 er ein ajourføring og modernisering á økinum (metrologi).

Lógin er gjørd sum ein rammulóg fyri betri at geva møguleikar fyri at fylgja við tí teknologiska útviklingi, sum fer fram, og ynskjum frá vinnulívi og brúkara. Eftir lógini verður »Justervæsenet« frá at vera ein statsstovnur broytt til ein sjálveigandi teknologiskan stovn undir navninum »DANTEST«.

Henda broyting er longu farin fram og vil lógarbroytingin, hvat hesum viðvíkur, tí ikki merkjast í praksis.

Nýggja lógin fevnir eisini um statsautoriseraðar vigarar, men tá málsøkið »vigarar« er yvirtikið mál, verður tann parturin av lógini, ið viðvíkur statsgóðkendum vigarum, ikki settur í gildi í Føroyum.

Eilif Lindberg, justermeistari, hevur havt málið til ummælis, og mælir hann til at lógin verður sett í gildi í Føroyum við omanfyri nevndu broytingum.

Viðlagt fylgir eintak av lógini.

1. viðgerð 14. mars. Málið varð beint í lóganevndina, sum 29. mars 1984 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð framlagt av landsstýrinum tann 12. mars 1984 og við 1. viðgerð 14. í s.m. beint í lóganevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og tekur ein samd nevnd undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 3. apríl 1984. Uppskotið samtykt við 24-0.

F.L.j.nr. 1126-1.

# 68. Løgtingslóg um útbjóðing.

Ár 1984, týsdagin 20. mars legði Páll Vang, landsstýrismaður, fyri Anfinn Kallsberg, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**

**løgtingslóg um útbjóðing v.m.**

§ 1. Henda lóg er galdandi fyri innheinting av boðum uppá arbeiðir og veitingar innan byggivirksemi.
*2. stk.* Lógin er eisini galdandi fyri innheinting av boðum uppá arbeiðir og veitingar við tilknýti til byggivirksemi, og sum verða útboðin í hesum sambandi.

**§ 2.** Sum útbjóðing eftir hesi lóg er at skilja, at arbeiðir ella veitingar verða bodnar út so leiðis, at fleiri innan somu tíðarfreist, og við sama útbjóðingartilfari sum grundarlag, kunnu geva bindandi skrivlig boð, og soleiðis at tað í útbjóðingini verður upplýst, at eisini aðrir hava fingið høvi til at bjóða.
*2. stk.* Verður í útbjóðingartilfarinum biðið um broytingar, frádráttar- og/ella sertilboð ella tílíkt, skal tað greitt í útbjóðingartilfarinum vera sagt

**lagtingslov om licitation m.v.**

§ 1. Denne lov finder anvendelse ved tilbudsgivning ved arbejder og leveancer inden for byggevirksomhed.
*Stk. 2.* Loven er også gældende for tilbudsgivning på arbejder og leveancer med tilknytning til byggevirksomhed og som udbydes i denne forbindelse.

§ 2. Ved licitation forstås i denne lov, at et arbejde eller en leverance udbydes, således at flere opfordres til inden samme bestemte tidspunkt og på samme udbudsgrundlag at give skriftlige og bindende bud, idet det ved opfordringen tilkendegives, at også andre er opfordret til at byde.
*Stk. 2.* Anmodes der i udbudsgrundlaget om ændrings-, fradrags- og eller særtilbud eller lignende, skal det tydeligt tilkendegives i udbudsmaterialet, hvil

frá, hvørjar av hesum upphæddum tilsamans eru kappingargrundarlagið.
*3. stk.* Almenn útbjóðing verður lýst í bløðunum ella á líknandi hátt uttan nakra avmarking av, hvør ið kann bjóða.
*4. stk.* Er útbjóðingin bundin (ikki almenn) verður áheitan um at bjóða send beinleiðis og bert til teir, ið ein ynskir at fáa boð frá.

§ 3. Boð í samband við útbjóðing skulu altíð latast inn í afturlatnum brævbjálva, sum verður opnaður ta frammanundan ásettu tíðina á útbjóðingarstaðnum. Tey, sum boðið hava, hava rætt til at vera hjástødd tá ið boðini verða latin upp og verða gjørd kunnug við boðsupphæddirnar og møgulig fyrivarni.
*2 stk.* Har umhugsni fyri undirarbeiðstakarum ger tað neyðugt, kann almannakunngerðing av tilboðnum útsetast til aftaná høvuðstilboðini eru latin upp, um nevndu boð frá undirarbeiðstakarum eru partar av hesum.

§ 4. Útbjóðarin hevur
1) tá ið útbjóðingin er almenn, ræft til at velja ímillum øll innkomnu boðini ella at havna tey øll,
2) tá ið útbjóðingin er bundin, skyldu til at taka tað lægsta boðið, ella at havna tey øll

ke af disse summer, der tilsammen udgør konkurrencegrundlaget.
*Stk. 3.* Ved offentlig licitation rettes opfordring til at byde ved bekendtgørelse i dagspressen eller på lignende måde til en ubestemt kreds.
*Stk. 4.* Ved bunden (ikke-offentlig) licitation rettes opfordringen til at byde direkte og alene til dem, fra hvem bud ønskes.

§ 3. Ved enhver licitation indgives buddene i lukket kuvert, der åbnes på licitationsstedet på et forud fastsat tidspunkt. De bydende er berettiget til at være til stede ved åbningen af buddene og til at blive bekendt med budsummerne og eventuelle forbehld.
*Stk. 2.* Hvor hensynet til underentreprenører gør det nødvendigt, kan offentliggørelse af tilbud udsættes til efter at hovedtilbuddene er åbnet, såfremt nævnte tilbud fra underentreprenører er dele af disse.

§ 4. Udbyderen er
1) ved offentlig licitation berettiget til at vælge mellem samtlige indkomne bud og til at forkaste dem alle,
2) ved bunden licitation forpligtet til at antage det billigste bud eller forkaste dem

og boða luttakarunum frá hesum.

*2. stk.* Tá ið útbjóðing fer fram, má eitt avhendað boð, sum er hægri enn eitt annað boð, ikki lækkast.

**§ 5.** Í samband við útjóðing er bannað

1) frammanundan at javna boð,
2) at áseta treytir um upplating av boðum

og

3) at taka boð burturúr.

*2. stk.* Avtalur og viðtøkur um skyldu til frammanundan at boða yrkisfeløgum frá boðum, ella um skyldu hjá bjóðandi til at tingast ella á annan hátt at samarbeiða áðrenn boðið verður, eru bannaðar.

*3. stk.* Áðrenn boðini skulu vera inni, mugu bjóðandi bert hava fundir um útbjóðingina fyri at tingast um útbjóðingartilfarið, herundir spurningar um fyrivarni av tekniskum orsøkum og bert um útbjóðarin fær áheitan um at møta og bæði bjóðandi, sum eru skipaðir og óskipaðir, hava sama møguleika at luttaka á fundinum.

alle ved meddelelse til de bydende.

*Stk. 2.* Ved en licitation må et bud, som er højere end et andet ved licitationen afgivet bud, ikke nedsættes.

**§ 5.** Ved tilbudsgivning er det forbudt

1) at gennemføre forudgående regulering af bud,
2) at fastsætte betingelser for åbning af bud

og

3) at foretage udskydning af bud.

*Stk. 2.* Aftaler og vedtagelser om pligt til forudgående anmeldelse af licitationsbud til de bydende organisationer eller om pligt for bydende til at forhandle eller på anden måde samarbejde inden tilbudsgivningen er forbudt.

*Stk. 3.* Forud for licitationen må bydende kun afholde møder vedrørende licitationen til drøftelse af udbudsgrundlaget, herunder spørgsmål om teknisk begrundede forbehold, og kun såfremt udbyderen opfordres til at komme til stede og såvel organiserede som uorganiserede bydende på lige vilkår har adgang til mødet.

**§ 6.** Loyvt er ikki at taka ímóti framíhjáboðum um so er, at ein áður uppá sama arbeiði ella somu veiting hevur fingið útbjóðing-

**§ 6.** Det er ikke tilladt at modtage underhåndsbud, såfremt der tillige på samme arbejde eller leverance er modtaget lici-

arboð ella meira enn eitt framíhjáboð og ikki eru lidnir í minsta lagi 6 mánaðir frá útbjóðingardegnum, ávikavist aftaná móttøkuna av seinasta framíhjáboðnum, ella tríggjar mánaðir aftaná afturtøku av útbjóðingini ella havnan av framíhjáboðunum

*2. stk.* Útbjóðing av arbeiði ella veiting, sum áður er útboðin ella framíhjáboð útvegað, kann í fyrsta lagi fara fram, tá ið tann fyrra útbjóðingin er tikin aftur, ella móttikin framíhjáboð eru havnað.

*3. stk.* Afturtøka av útbjóðing skal skrivliga fráboðast øllum bjóðandi.

**§ 7.** Ásetingar í løgtingslóg um príseftirlit og løgtingslóg um vinnu verða framvegis galdandi fyri viðurskifti eftir hesi lóg.

**§ 8.** Brot á §§ 3, 4, 5 og 6 verða revsað við bót ella hefti um so er, at strangari revsing ikki er uppiborin eftir borgarligu revsilógini. Aðrenn akæra verður reist, skal málið leggjast fyri prísráðið til ummælis.

*2. stk.* Verður brotið framt av einum partafelag, lutafelag, felagsskapi ella tílíkum, kann felagið sjálvt koma undir bót.

**§ 9.** Henda lóg kemur í gildi 1. juli 1984.

tationstilbud, og der ikke er forløbet enten mindst 6 måneder fra licitationsdagen, henholdsvis efter modtagelsen af det seneste underhåndsbud, eller 3 måneder efter annulleringen af licitationen eller underhåndsbuddene.

*Stk. 2.* Licitationen over et arbejde eller en leverance, over hvilke der tidligere er afholdt licitation eller modtaget underhåndsbud, må først afholdes, når den tidligere licitation eller de modtagne underhåndsbud er annulleret.

*Stk. 3.* Annullering af en licitation skal ske ved skriftlig tilkendegivelse fra udbyderen til hver af de bydende.

**§ 7.** Bestemmelserne i lagtingslov om pristal og lagtingslov om næring finder i øvrigt fortsat anvendelse på de af nærværende lov omfattede forhold.

**§ 8.** Overtrædelse af §§ 3, 4, 5 og 6 straffes med bøde eller hæfte, medmindre højere straf er forskyldt efter borgerlig strafflov. Forinden tiltale rejses, skal sagen forelægges prisrådet til udtalelse.

*Stk. 2.* Er overtrædelsen begået af et aktieselskab, et andelsselskab, en organisation eller lignende, kan bødeansvar pålægges selskabet som sådan.

**§ 9.** Denne lov træder i kraft 1. juli 1984.

**Viðmerkingar:**
Føroya Handverksmeistarafelag hevur heitt á landsstýrið um at fáa eina licitatiónslóg setta í gildi í Føroyum.

Málsøkið er yvirtikið sum sermál, men eru ongar lógarreglur galdandi í Føroyum um útbjóðing av arbeiðum v.m.

Frammanfyri standandi uppskot er gjørt við teirri donsku lógini sum fyrimynd við ymsum broytingum, umframt at nøkur av teimum serligu ynskjunum hjá meistarafelagnum eru tikin við.

Til tær einstøku greinirnar skulu gerast fylgjandi viðmerkingar:

*Ad § 1:* Lógin er galdandi fyri útbjóðing av arbeiði og veitingum innan byggivirksemi. Við byggivirksemi er t.d. at skilja bygging av bygningum, havnabygging, vegabygging og onnur jørðarbeiði, skipabygging og umvælingararbeiði av frammanfyri nevnda virksemi. Eisini er lógin galdandi fyri arbeiði, ið ein høvuðsentreprenørur bjóðar út til undirentreprenørar. Lógin er eisini galdandi fyri arbeiðir og veitingar, ið verða útboðin í samband við byggiarbeiðir, men sum ikki beinleiðis kunnu sigast at vera byggiarbeiðir, t.d. útbjóðing av tekniskari útgerð, gólvteppum v.m.

*Ad § 2:* Í hesi grein verður lýst, hvat útbjóðing er eftir lógini, nevniliga tilboðsgeving innan byggivirksemi og skulu fylgjandi 4 treytir vera loknar:

1. at heitt verður á fleiri um at geva tilboð uppá arbeiði innan eina ávísa freist,
2. at tilboðini skulu byggja á sama útbjóðingargrundarlag,
3. at tilboðini skulu vera skrivlig og bindandi fyri tilboðsgevararnar og
4. at tað í samband við útbjóðingina verður upplýst, at fleiri hava fingið høvi til at bjóða.

*Ad § 3:* Reglurnar í hesi grein skulu tryggja, at tilboðsgevararnir verða stillaðir líka við at krevja, at tilboðini skulu vera í afturlatnum brævbjálvum, sum verða opnaðir samstundis, meðan tilboðsgevararnir kunnu vera hjástaddir. Reglan gevur eisini tilboðsgevarunum eftirlit við, at kappingarreglurnar verða hildnar, tí boðshæddirnar og møgulig fyrivarni samstundis skulu upplýsast.

*Ad § 4:* Er útbjóðingin almenn, hevur útbjóðarin rætt til at velja ímillum øll tilboðini ella at havna teimum øllum, meðan hann, um

útbjóðingin er bundin (ikki almenn) skal taka við lægsta tilboðnum ella eingi taka.

Orsøkin til at útbjóðarin, tá ið útbjóðingin er almenn, skal kunna velja ímillum øll tilboðini, er tann, at útbjóðarin onga ávirkan hevur á, hvør bjóðar og má hava rætt til at havna tilboði frá tilboðsgevarum, sum hann ikki metir vera førar fyri tekniskt ella fíggjarliga at útinna arbeiðið eftir sáttmálanum. Vanliga verður tó lægsta tilboðið tikið, um arbeiðstakarin verður mettur førur fyri at avrika arbeiðið.

Er útbjóðingin bundin, hevur útbjóðarin skyldu til at taka við lægsta tilboðnum ella eingi at taka. Grundin fyri hesum er, at útbjóðarin sjálvur hevur avgjørt, frá hvørjum hann ynskir tilboð og tí frammanundan hevur mett, at allir eru førir fyri at avrika arbeiðið.

Eftir 3. stk. í somu grein er ikki loyvt at lækka eitt útbjóðingartilboð ella at biðja um eitt lægri tilboð. Hetta kann fyrst lata seg gera aftaná 3 mánaðir, samanber § 6, 1. stk.

*Ad § 5:* Reglurnar í hesi grein skulu verja útbjóðaran (byggiharran) í fyrsta lagi móti organisatiónsviðtøkum, sum kunnu hava óhepna ávirkan á fríu kappingina. Loyvt er soleiðis ikki frammanundan at tingast ella samarbeiða um útbjóðingina, ella gera nakra avtalu um javning av tilboðum ella at taka tilboð burturúr. Um fundur skal verða frammanundan, kann hesin bert verða um útbjóðingartilfarið og skulu allir partar fáa høvi at møta á fundinum.

*Ad § 6:* Henda grein hevur til endamáls, við at seta freistir fyri innheinting av nýggjum tilboðum, at verja tey útbjóðandi móti trýsti at geva lægri tilboð vísandi til tey fyriliggjandi tilboðini.

Útbjóðing av nýggjum kann altíð fara fram, tá ið tann fyrra útbjóðingin er tikin aftur ella øll frammíhjátilboð havnað. Annars eru freistirnar hesar:

a) Útbjóðing afturtikin:
   Frammíhjátilboð kunnu útvegast aftaná 3 mánaðir roknað frá afturtøkuni. Nýggj útbjóðing kann fara fram beinan vegin.
b) Útbjóðing ikki tikin aftur:
   Frammíhjátilboð kunnu útvegast aftaná 6 mánaðir, roknað frá útbjóðingardegnum. Nýggj útbjóðing kann ikki fara fram.
c) Áður eru útvegað fleiri frammíhjátilboð, ið øll eru tikin aftur:
   Fleiri frammíhjátilboð kunnu útvegast triggjar mánaðir aftaná at fyrstu tilboðini eru havnað. Útbjóðing kann beinan vegin fara fram.

d) Áður eru útvegað fleiri framm íhjátilboð, ið ikki eru havnað:
Fleiri framm íhjátilboð kunnu útvegast aftaná 6 mánaðir roknað frá móttøkuni av seinasta tilboðinum. Útbjóðing kann ikki fara fram.

*Ad § 7:* Tær reglur í nevndu lógum, sum talan kann verða um eru reglurnar um fráboðanarskyldu um avtalur, samtyktir v.m. um prísviðurskifti og um forboð fyri tílíkum avtalum, um tær kunnu føra við sær óríniligar prísir ella óríniligar skerjingar í landsins vinnufrælsi.

1. viðgerð 26. mars. Málið varð beint í lóganevndina og er ikki komið aftur hagani.

F.L.j.nr. 627-1.

---

# 69. Uppskot til samtyktar viðvíkjandi Sumbiar bergholi.

Ár 1984, fríggjadagin 16. mars legði Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir, at næsta bergholsgerð, sum farið verður undir, verður bergholi í millum Lopra og Sumba. Tá ið Leirvíkar bergholið er liðugt borað, verða bori- og onnur tunnilsamboð flutt til Suðuroyar eins og neyðug vegagerð v.m. til projekteraðan bergholsmunna verður byrjað beinan vegin.

**Viðmerkingar:**
Hetta málið, berghol millum Lopra/Sumba, hevur so ofta verið á tingborði, síðani løgtingið í 1978 samtykti, at hetta bergholið skuldi gerast, eins og løgtingið tá gav landsstýrinum heimild til at upptaka neyðug lán, so at óneyðugt skuldi verið at lýst málið meira, enn tað hevur verið gjørt.

Tó skal einans minnast á ta fundarsamtykt og adressu, sum allir ting- og landsstýrismenn fingu í januar í ár, hvar m.a. verður sagt: »Undirritaðu íbúgvar í Sunnbiar sókn, Sunnbiar bygdarráð og bý- og bygdarráðsformenn í Suðuroy krevja hervið, at . . . . . vegirnir í sambandi við hetta verður byrjað í seinasta lagi 1. apríl í ár. Eingin undanførsla av nøkrum slagi verður góðtikin í sambandi við hetta mál . . . . . .« og eisini undirskrivað av øllum Suðuroyar tingmonnum og landsstýrismanninum Páll Vang.

Fyri Sumbiar sókn og Suðuroynna sum heild hevur hetta mál avgerandi lívstýdning fyri allan framburð, trivnað, bygdamenning og forðan fyri avtoftan av hesi stóru sókn, at tað nú í 1984 fær nýtiligt vegasamband.

Tá hetta mál hevur so alstóran lívstýdning fyri Suðuroynna, hevur verið roynt at halda málið leyst av øllum partapolitikki og vónandi eydnast hetta framyvir, so fyriliggjandi uppskot til samtyktar fær eina tvørpolitiska loysn, óhefta av partapolitikki.

Vónandi fara allir tingmenn at atkvøða fyri málinum — einans út frá persónligari sannføring og samvitsku.

1. viðgerð 21. mars. Málið varð beint í fíggjarnevndina eftir atkvøðugreiðslu ímóti, sum fall við 16-0. Fíggjarnevndin legði 10. apríl fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av Ove Mikkelsen, løgtingsmanni, tann 16. mars 1984 og undir 1. viðgerð tann 21. mars 1984 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meirilluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Svend Åge Ellefsen og Øssur Dam Jacobsen vísa til viðmerkingar

sínar í álitinum í løgtingsmáli nr. 81/1983: Berghol Lopra/Sumba.

Minnilutin (Atli P. Dam og Adolf V. Hansen) tekur undir við málinum og vísir til viðmerkingar sínar í løgtingsmáli nr. 81/1983: Berghol Lopra/Sumba.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) tekur undir við málinum.

2. viðgerð 27. apríl. Atkvøðugreiðsla 4. mai. Uppskotið, pkt. 1, fall við 14 ja-atkvøðum, 3 nei-atkvøðum, 14 atkvøddu ikki, ein var burturstaddur. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

| | |
|---|---|
| Ja atkvøddu: | Adolf Hansen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Ingrid Sondum, Hans J. Debes, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen. |
| Atkvøddu ikki: | Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Fredrik Olsen, Poul Michelsen, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Edmund í Garði, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein. |
| Nei atkvøddu: | Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Arne Ziskasen. |

---

# 70. Veitan av láni og studningi til útvegan og byggibúgving av jørð til sethúsa- og íbúðabygging.

Ár 1984, mikudagin 14. mars legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot til løgtingslóg um veitan av láni og studningi til útvegan og byggibúgving av jørð til sethúsa- og íbúðabygging.**

**Forslag til lagtingslov om ydelse af lån og tilskud til tilvejebringelse og byggemodning af jord til byggegrunde til beboelseshuse og lejligheder.**

§ 1. Stovnaður verður grunnur við tí endamáli at veita kommunum lán og studning til útvegan og byggibúgving av jørð til sethúsa- og íbúðabygging. Navn grunsins er Byggibúgvingargrunnur landsins.

§ 1. Der oprettes et fond med det formål at yde kommuner lån og tilskud til tilvejebringelse og byggemodning af jord til byggegrunde til beboelseshuse og lejligheder. Fondets navn er »Byggibúgvingargrunnur landsins«.

§ 2. Tann peningur, ið sambært løgtingslóg nr. 38 frá 26. apríl 1974 er settur í kommunala lánsgrunnin, verður, tá henda lóg kemur í gildi, fluttur yvir í byggibúgvingargrunn landsins.
*2. stk.* Byggibúgvingargrunnurin yvirtekur virksemið — skyldur og rættindi — hjá kommunala lánsgrunninum, ið varð settur á stovn sambært løgtingslóg nr. 38 frá 26. apríl 1974.

§ 2. De penge, der i henhold til lagtingslov nr. 38 af 26. april 1974 er sat i den kommunale lånefond, skal, når denne lov træder i kraft, overføres til »Byggibúgvingargrunn landsins«.
*2. stk.* »Byggibúgvingargrunnurin« overtager den kommunale lånefonds aktiviteter — forpligtelser og rettigheder. Den kommunale lånefond blev stiftet i henhold til lagtingslov nr. 38 af 26. april 1974.

§ 3. Umfrant hetta letur landskassin byggibúgvingargrunni landsins eitt stovnsfæ upp á 30 mió. kr., og verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna at upptaka neyðug lán til endamálið.

§ 3. Desforuden yder landskassen »Byggibúgvingargrunni landsins« fonds kapital på 30 mio. kr., og har landsstyret hjemmel landskassens vegne at optage nødvendige lån til formålet.

**§ 4.** Frá fíggjarárinum 1984/85 og hvørt fylgjandi fíggjarár verður rentuskatturin undir § 1 á løgtingsfíggjarlógini tilskrivaður byggibúgvingargrunni landsins.

**§ 5.** Grunnurin verður umsitin av umsitingini hjá húsalánsgrunninum og stjórnaður av einum stýri við fimm limum, harav Føroya Landsstýri velur ein, meðan Føroya Løgting og føroysku kommununar velja hvør sínar tvcir limir. Í samráð við løgtingsins fíggjarnevnd og stýrið fyri grunnin ásetir landsstýrið nærri reglur viðvíkjandi virki grunsins.

**§ 6.** Treytin fyri at fáa lán og studning úr byggibúgvingargrunni landsins er:

a) at avvarðandi kommuna hevur góðkenda byggisamtykt,
b) at søkt verður til ávísa útstykkingarætlan,
c) at kostnaðurin fyri jørð og byggibúgving ikki er órímuliga høgur,
d) at útsøluprísurin lækkar í mun til studningin, so at hesin kemur teimum til góðar, ið skulu keypa grundstykki, sethús ella íbúð burtur av viðkomandi útstykking.
e) at avvarðandi kommuna eisini letur ein studning til grundstykkjaprísin, sum í

**§ 4.** Fra finansåret 1982/83 og hvert af de følgende finansår tilskrives renteskatten under § 1 på lagtingsfinansloven »Byggibúgvingargrunnur landsins«.

**§ 5.** Fondet administreres af huslånefondets administration og styres af en bestyrelse på fem medlemmer, hvoraf Færøernes landsstyre vælger en, medens Færøernes lagting og de færøske kommuner vælger hver sine to medlemmer. I samråd med lagtingets finansudvalg og fondets bestyrelse fastsætter landsstyret nærmere regler angående fondets virksomhed.

**§ 6.** Betingelsen for at få lån og tilskud fra »Byggibúgvingargrunni landsins« er:

a) at vedkommende kommune har godkendt byggevedtægt,
b) at ansøgningen gælder en bestemt udstykningsplan,
c) at prisen på jord og byggemodning ikke er urimelig høj,
d) at salgsprisen falder i forhold til tilskudet, således at denne kommer dem tilgode, som skal købe byggegrund, beboelseshus eller lejlighed af vedkommende udstykning,
e) at vedkommende kommune også yder tilskud til prisen på byggegrunden, som

minsta lagi svarar til 10% av samlaðu útveganar- og byggibúgvingarkostnaðinum.

f) at grannskoðaður roknskapur fyri hvørja útstykkingarætlan sær verður sendur grunninum til góðkenningar.

§ 7. Studningurin úr grunninum kann í mesta lagi verða 20% og og lánið í mesta lagi 60% av samlaða kostnaðinum fyri eina útstykkingarætlan. Lánini verða rentað við tí til eina og hvørja tíð galdandi rentu hjá húsalánsgrunninum. Renta av lánum fellur til gjaldingar tvær ferðir um árið. Lán verða afturgoldin, so hvørt sum grundstykkini verða seld. Triðingurin av lánsupphæddini skal tó rindast aftur í seinasta lagi trý ár eftir, at lánið er útgoldið lántakaranum. Alt lánið skal verða afturgoldið í seinasta lagi 15 ár eftir, at tað er útgoldið lántakaranum.

§ 8. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 38 frá 26. apríl 1974 um veitan av láni til kommunur til keyp av jørð.

mindst svarer til 10% af den samlede tilvejebringelses- og byggemodningspris,

f) at revideret regnskab for hver enkelt udstykningsplan sendes fondet til godkendelse.

§ 7. Tilskudet fra fondet kan højst udgøre 20% og lånet højst udgøre 60% af de samlede omkostninger for en udstykningsplan. Lånene forrentes med den til enhver tid gældende rente for huslånefonden. Renten af lånene forfalder til betaling to gange årligt. Lånene tilbagebetales efterhvert som byggegrundene bliver solgt. Trediedelen af lånesummen skal dog tilbagebetales senest tre år efter at lånet er udbetalt låntageren. Alt lånet skal være tilbagebetalt senest 15 år efter, at det er udbetalt låntageren.

§ 8. Denne lov træder i kraft straks. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 38 af 26. april 1974 om ydelse af lån til kommuner til opkøb af jord.

**Viðmerkingur:**

Hóast ymisk skilagóð tilløk frá almennari síðu til tess at bøta um trotið á sethúsum og íbúðum, er framvegis stór húsaneyð í Føroyum, serstakliga í teimum størru býunum og bygdunum í landinum.

Nógvar orsakir eru til hesa húsaneyð, eitt nú tann ógvuliga sterka centralisering, sum er farin fram tey seinastu 25 árini, sum hevur

gjørt, at kommunalir myndugleikar illa hava kunnað fylgt við í útstykkingum av byggigrundum í mun til tørvin.

Av øðrum orsøkum kann verða víst á ymisk brek við sjálvari fíggingarskipanini fyri byggibúning og sethúsabygging.

Sum fíggingin av sethúsum er skipað í dag, so fyritreytar hon, at tann, sum skal byggja, sjálvur eigur grundstykki, áðrenn hann fer til tann almenna og teir privatu lánstovnarnar. Hjá teimum, sum framinanundan hava ognað sær grundstykki, er vanliga ikki torført at fáa fígging til sjálva byggingina. Hóast henda fígging er tung hjá lántakaranum at lyfta, so er hon tó vanliga soleiðis háttað, at hann, ið byggir, fær tað mesta liðugt. Tey flestu fáa øll húsini liðug — onnur so mikið, at tey fáa verið inni, til tey sjálv hava smíðað liðugt, ella til lánsmøguleikarnir batna.

Øðrvísi er við teimum mongu, sum einki grundstykki eiga, men fegin vilja byggja sær sethús ella hava eina likinda íbúð at flyta í.

Hesi fólk hava ofta skrivað seg upp bæði hjá kommunu og hjá privatu jarðaeigarum í tí vón einaferð at verða so heppin at fáa byggigrund.

Prísurin á hesum stykkjum, kommunalum sum privattum, er støðugt hækkandi, hóast kommununrnar hava gjørt eitt stórt arbeiði fyri at halda prísunum niðri. Í einari kommunalari útstykking í høvuðsstaðnum liggur prísurin um 120-130 kr. fyri m², og sum kunnugt er hann munandi hægri í teimum privatu útstykkingunum. Hetta merkir, at eitt vanligt grundstykki nú kostar millum 140.000 og 250.000 kr.

Av hesum fylgir aftur, at bert hetta at fáa byggigrund til vega er vorðið eitt ógvuliga tungt tak hjá tí, sum ætlar sær at byggja. Mong noyðast sostatt at spara upp í áravís fyri at kunna keypa stykkið. Onnur noyðast at taka stór lán til at gjalda grundstykkið við og eru sostatt longu bundin av stórari skuld, áðrenn spakin verður settur í jørðina. Uppaftur onnur hava als ongan møguleika at ogna sær grundstykki, antin tí, at tey ikki fáa lán til grundstykkjakeyp ella tí, at tey yvirhøvur ikki kunnu fáa hendur á einum stykki. Sostatt hongur húsaneyðin óloysiliga saman við spurninginum um ústykkingar og útboð av grundstykkjum. Tað er trotið á grundstykkjum til ein yvirkomiligan prís, sum nú tykist at vera fløskuhálsurin í allari sethúsa- og íbúðabygging í Føroyum.

Hetta álvarsama trot á bíligum og byggiklárum grundstykkjum metir javnaðarflokkurin sum eitt samfelagsmál, ið bert kann verða loyst sum ein samfelagsuppgáva. Tiskil mælir javnaðarflokkurin við fyriliggjandi uppskoti til, at tað almenna, t.v.s. land og kommunu

í nógv størri mun enn higartil átaka sær uppgávuna at fáa til vega nóg mikið av bíligum, byggiklárum grundstykkjum um alt landið.

Tað er Javnaðarfloksins meting, at kommunali lánsgrunnurin, stovnsettur við lóg nr. 38 frá 26. apríl 1974, ikki røkkur til at greiða tørvin á grundstykkjum, og tí mælir flokkurin til at seta á stovn ein nýggjan grunn við meira víttfevnandi virkisøki og munandi størri fíggjarorku. Í hesum sambandi verður í § 8 skotið upp at avtaka kommunala lánsgrunnin, og í § 2 verður skotið upp at flyta tann pening, sum er í hesum lánsgrunni yvir í nýstovnaða byggibúgvingargrunn landsins. Eisini verður skotið upp, at landskassin letur byggibúgvingargrunninum eitt stovnsfæ upp á 30 mió. kr., og somuleiðis at inntøkan av rentuskattinum upp á ca. 10 mió. kr. um árið í framtíðini verður tilskrivað hesum grunni. Á henda hátt fáa kommunurnar sín part av einum skatti, ið annars allur er farin í landskassan.

Sum tað framgongur av lógaruppskotinum, so er ætlanin at byggibúgvingargrunnurin skal hava stýri leyst av húsalánsgrunninum, meðan umsitingin verður felags. Hetta er fyri at sleppa undan dupultari umsiting, meðan ein varðveitir eina decentrala ávirkan á grunnsins stýri í gjøgnum umboð kommununnar.

Mælt verður í lógaruppskotinum til, at lánini verða afturgoldin so hvørt grundstykkini verða seld. Tó verður skotið upp, at 1/3 av lántøkuni verður at gjalda aftur í seinasta lagi 3 ár eftir, at lánið er veitt avvarðandi kommunu, meðan alt lánið eigur at verða goldið aftur í seinasta lagi 15 ár eftir lántøku.

Samanumtikið kann sigast, at høvuðsendamálið við lógaruppskoti Javnaðarfloksins um ein byggibúgvingargrunn er at eggja kommununum til at fara undir munandi fleiri útstykkingar, enn talan er um í løtuni. Við hesum uppskoti kunnu grundstykkini, um rætt verður atborið, bæði gerast nógv fleiri og upp á seg væl bíligari enn nú. Hetta skuldi sostatt gjørt tað munandi lættari at fingið byggigrundir til sethús hjá tí einstaka, men tað skuldi eisini lætt um og styrkt hugin hjá kommunum, sosialum felagsskapum og stýrinum fyri íbúðagrunnin at sett í verk bygging av íbúðum, soleiðis at eisini hesin serligi tørvur á bústaði verður nøktaður. Tað er veruleiki, at ikki øll ynskja at eiga síni egnu sethús eins og heldur ikki øll kunnu eiga síni egnu sethús. Hesi hava eisini sín rætt — ein rætt, sum tað í dag tykist ógvuliga tungt at fáa framdan.

Uppskotsstillarin, Føroya Javnaðarflokkur, er greiður yvir, at ein ávísur vandi fyri spekulatión er í øllum hesum, og er § 6 í lógaruppskotinum ætlað at skula forða fyri slíkari spekulatión og øðrum

møguligum misbrúki. Møguliga kundu heilt aðrir útvegir verið funnir til tess at byrgja fyri spekulatión og í heila tikið fyri mongum av teimum ódámligu fyribrigdum, sum ofta hanga uppi í øllum jarðarspurninginum, og sum ofta fylgja við tí stóra trotinum á byggilendi.

1. viðgerð 20. mars. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 6. apríl legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av Javnaðarflokkinum tann 14. mars 1984 og undir 1. viðgerð tann 20. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Atli P. Dam og Adolf V. Hansen) tekur undir við málinum.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 11. apríl 1984. § 1 fall við 14-0. Uppskotið sostatt burturdottið.

---

# 71. Partapeningur í P/f Føroya Agngoymslu.

Ár 1984, mikudagin 14. mars legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um partapening í pf. Føroya Agngoymslu**

**§ 1.** Landskassans vegna setur landsstýrið 10 mió. kr. í partapeningi í partafelag, sum hevur til endamáls at tryggja agnveiting samsvarandi tørvi føroysku fiskivinnunar.

*2. stk.* Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri rakstrarláni til felagið stórt 10 mió. kr.

*3. stk.* Felagið er meginfelag fyri agnsamtak føroysku fiskivinnunnar.

*4. stk.* Navn felagsins er p/f Føroya Agngoymsla og heimstaður tess er Tórshavn.

**§ 2.** Fyri at útvega neyðugan pening til endamálið, verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna, at taka 10 mió. kr. í láni.

**§ 3.** Felagið skal fyriskipa agngoymslu í hvørjari sýslu, keypa upp agn ella råvøru til agnframleiðslu, fyriskipa neyðugum agnflutningi ímillum goymslurnar og lata vinnuni agn fyri ein prís, ið er hin sami frá øllum goymslum felagsins.

**§ 4.** Landsstýrinum er heimilað at veðhalda fyri neyðugum fløg-



**lagtingslov om aktiekapital i P/F Føroya Agngoymslu**

**§ 1.** For landskassen indskyder landsstyret 10 mio. kr. i aktiekapital i et aktieselskab, der har til formål at sikre agnforsyning i overensstemmelse med de behov, det færøske fiskerierhverv har.

*Stk. 2.* Landsstyret får hjemmel til på landskassens vegne at garantere for et driftslån til selskabet på 10 mio. kr.

*Stk. 3.* Selskabet er fællesselskab for det færøske fiskerierhvervs agnsammenslutninger.

*Stk. 4.* Selskabets navn er P/f Føroya Agngoymsla og dets hjemstavn er Tórshavn.

**§ 2.** For at tilvejebringe nødvendig kapital til formålet bemyndiges landsstyret til på landskassens vegne at optage lån på 10 mio. kr.

**§ 3.** Selskabet skal administrere agnlager i hver syssel, opkøbe agn eller råvarer til agnproduktion, administrere nødvendig transport mellem lagrene og sælge agn til erhvervene til en pris, som er det samme for alle selskabets lagre.

**§ 4.** Landsstyret får hjemmel til at garantere for nødvendige

ulánum til hvørja goymslu sær, tá hesi kunnu veðtryggjast innanfyri 90% av metingarvirði goymslunnar.

§ 5. Fyri felagnum situr nevnd við sjey limum harav ein er valdur av Føroya Fiskimannafelag, ein av Meginfelag Útróðramenna, ein av Føroya Reiðarafelag, triggir av Føroya Løgtingi og ein av Føroya Landsstýri. Hesin seinasti er formaður nevndarinnar. Nevndin setur leiðara og neyðugt starvsfólk at fyriskipa dagliga virki megindeildarinnar og í undirfeløgum, sum verða stovnað samb. § 6.

§ 6. Av partapeningi sínum kann felagið í hvørjum einstøkum føri seta upp til 50% av partapeninginum í sýslufeløg, ið saman við útróðrarsamtøkum, egningarmiðstøðum, flakavirkjum, kommunum ella øðrum stovnsetir agnmóttøku, goymslu og útflýggjan.

*2. stk.* Har tað ikki er møguligt at stovnseta sýslufelag saman við partaeigarum í økinum, er p/f Føroya Agngoymslu loyvt at stovna undirfelag og útvega allan eginpeningin.

*3. stk.* Meginfelagnum er heimilað at gera sáttmála við eigarar av frystigoymslum um leigu, afturatbygging, umsiting, felags

investeringslån til hvert lager for sig, når disse kan pantesikres indenfor 90% af lagrenes vurderingssum.

§ 5. Selskabet, der styres af en bestyrelse på 7 medlemmer, hvoraf en vælges af Føroya Fiskimannafelag, en af Meginfelag útróðramanna, en af Føroya Reiðarafelag, 3 af Færøernes Lagting og en af Færøernes Landsstyre. Den sidste er bestyrelsens formand. Bestyrelsen ansætter leder og nødvendigt personale til at forestå den daglige administration i hovedafdelingen og i underafdelingerne, der stiftes i overensstemmelse med § 6.

§ 6. Af sin aktiekapital kan selskabet i hvert enkelt tilfælde sætte op til 50% af aktiekapitalen i sysselselskaber der sammen med hjemmefiskeriselskaber, agncentraler, filétfabrikker, kommuner eller andre etablerer modtagelse af agnopbevaringer og udlevering.

*Stk. 2.* Der, hvor der ikke har været muligt at etablere sysselselskab sammen med aktionærer i vedkommende område, får P/F Føroya Agngoymsla tilladelse til at stifte underselskab og fremskaffe hele egenkapitalen.

*Stk. 3.* Fællesselskabet får hjemmel til at gøre aftale med ejere af fryselagre om leje, tilbygning,

rakstur, uppisitaragjald og annað, tá nevndin metir, at slík avtala um rakstur felagsins vegna er lagaligast.

§ 7. Felagið verður rikið út frá vanligum rentabilitetssjónarmiðum, tó uttan órímiligan vinning av muninum millum keyps- og søluprís fyri rávøru og agn.
*2. stk.* Samlaðu útreiðslur samtaksins, herundir møguligar útreiðslur av megingoymslu, verða at líkna á samlaða umsetning meginfelagsins.
*3. stk.* Nevndin ásetur í samráð við prísásetingarnevndirnar fyri ráfisk ein rávøruprís, ið er galdandi fyri tríggjar mánaðir í senn.
*4. stk.* Til tess at tryggja lagaligasta agnprísin letur landskassin yvir fíggjarlógina agnstudning til rakstur felagsins, og letur felagið á hvørjum ári áðrenn 1. oktober landsstýrinum eina meting um studningstørvin.

administration, selskabets drift, lejeafgift, transportbetaling og andet, når bestyrelsen er af den formening at en sådan aftale om selskabets drift er den mest formålstjenlige.

§ 7. Selskabet drives ud fra sædvanlige rentabilitetsbetragtninger, dog uden urimelig fortjeneste af forskelle mellem købs- og salgsprisen for råvare og agn.
*Stk. 2.* De samlede udgifter for fællesselskabet, herunder mulige udgifter af fællesfageret, udlignes på den samlede omsætning hos fællesselskabet.
*Stk. 3.* Bestyrelsen fastsætter i samråd med prisansættelsesudvalgene for råfisk og industrifisk en råvarepris, der er gældende for 3 måneder ad gangen.
*Stk. 4.* Med det formål at tilsikre den lempeligste agnpris, betaler landskassen over finansloven agntilskud til selskabets drift og giver hvert år før den 1. oktober landsstyret en vurdering om behovet.

§ 8. Nevndin letur landsstýrinum uppskot til reglugerð fyri rakstur felagsins. Reglugerðin fær gildi við landsstýriskunngerð aftaná góðkenning av Føroya Landsstýri og løgtingsins fíggjarnevnd.

§ 8. Bestyrelsen fremsender til landsstyret forslag til reglement for selskabets drift. Reglementet får gyldighed i henhold til landsstyrets bekendtgørelse efter godkendelse af Færøernes Landsstyre og Lagtingets Finansudvalg.

§ 9. Henda lóg kemur í gildi 1. aprfl 1984.

§ 9. Denne lov træder i kraft den 1. april 1984.

**Viðmerkingar:**
Trupulleikarnir, ið standast av, at vit ikki altíð eru førir fyri at hava nóg mikið av góðum agni á goymslu og at vit ikki altíð eru førir fyri at taka ímóti feskum agni, tá hetta stendur okkum í boði, eru afturvendandi ár um ár. Hetta er til stóran skaða fyri heimaútróðurin og føroyska línuveiðu sum heild, tá tað stendur øllum greitt, hvussu ómetaliga stóran týdning agnið hevur fyri línuveiðuna.

Trupulleikarnir standast fyri stóran part av, at virkini kring landið, ið eisini skulu taka ímóti og tilvirka fisk, sum tey eisini skulu goyma í stytri ella longri tíð, hava ov lítla frystiorku og ov smáar kuldagoymslur, sofeiðis at vit ikki altíð eru førir fyri at taka ímóti og goyma tær nøgdir av góðum feskum agni, ið ofta standa okkum í boði.

T.d. er nógvur høgguslokkur at fáa so at siga kring alt landi summi ár. Men orsakað av ov lítlari frystiorku, hendi tað ferð eftir ferð, at virkini fleiri dagar á rað síga frá, at tey ikki kunnu taka ímóti. Og vegna tørvandi goymslurúm verður eitt partur av hesum høgguslokki fluttur av landinum, við tí úrsliti, at vit koma í ta støðu, at eingin elfa nærum eingin høgguslokkur er eftir á goymslu, tá stutt tíð er fráliðin.

Í størri og størri mun hava menn ásannað, at tað er vorðið til eina samfelagsskyldu, hetta at tryggja nóg mikið av góðum og bíligum agni. Umframt tað, sum er nevnt frammanfyri um høgguslokkin kann verða lagt afturat, at tað eisini eru dømir um, at føroysk nótaskip, sum eru stødd nær við Føroyar, hava boðið sær til at landa feskan makrel til agn her heima, men hava fingið avslag, orsakað av, at eldri innfluttur makrelur hevur ligið á goymslu.

Skotið verður upp at landskassin stovnar pf. Føroya Agngoymslu. Hetta er meginfelag, sum skal stovna sýslufeløg í hvørjari sýslu at taka ímóti, goyma og útflýggja agn. Partapeningurin er 10 mió. kr. Av hesi upphædd kann felagið í hvørjum einstøkum føri seta upp til 50% av partapeninginum í sýslufeløg, ið saman við útróðrasamtøkum, egningarmiðstøðum, flakavirkjum, kommunum ella øðrum stovnsetir agnmóttøku, goymslu og útflýggjan. Hetta vil siga, at meginfelagið einsamalt við teimum 10 mió. kr, kann fremja eina íløgu uppá 50 mió. kr. í eina øking av frystiorkuni og kuldagoymslunum.

Javnaðarflokkurin hugsar sær, at felagið kann byggja sjálvstøðug frystivirki við kuldagoymslum, at tað kann byggja saman við verandi ella komandi egningarmiðstøðum, at tað kann byggja saman við verandi og komandi flakavirkjum og at tað eisini kann leiga sær neyðug hølir. Eisini verður skotið upp, at har tað er neyðugt kann megin-

felagið seta allan eginpeningin í eitt sýslufelag, at landskassin veðheldur fyri einum rakstrarláni uppá 5 mió. kr. til felagið. Landsstýrinum verður eisini heimilað at veðhalda fyri neyðugum íløgulánum til hvørja goymslu sær, tá hesi kunnu veðtryggjast innanfyri 90% av metingarvirðinum.

Endamálið við samtakinum er, at vit í størst møguligan mun veiða agnið sjálvir, at vit hava nóg stóra frystiorku og nóg stórar kuldagoymslur, at allar agngoymslurnar kring landið hava eins gott agn, at allar selja agnið til eins prís, at prísurin verður rímuligur og at agnstudningurin á figgjarlógini framyvir verður latin samtakinum.

1. viðgerð 20. mars. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 6. apríl legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av Javnaðarflokkinum tann 14. mars 1984 og undir 1, viðgerð 20. í s.m. beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) tekur ikki undir við málinum, og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Atli P. Dam, Ove Mikkelsen og Adolf V. Hansen) mælir til at samtykkja uppskot Javnaðarfloksins, tó við teirri broyting í § 9 verður »1. apríl« broytt til »15. apríl« og setir fram soljóðandi

**broytingaruppskot**

til uppskot Javnaðarfloksins.

| | |
|---|---|
| Í § 9 verður »1. apríl« broytt til »15. apríl«. | I § 9 ændres »1. apríl« til »15. april«. |

2. viðgerð 11. apríl 1984. § 1 fall við 14-0 atkvøðum. Uppskotið sostatt burturdottið.

# 72. Lóg um sosialar eindir.

Ár 1984, mikudagin 14. mars legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt saman við neyðugari serkønari hjálp at gera uppskot til løgtingslóg um sosialar og heilsuligar eindir. Uppskotið eigur at verða gjørt í samráð við kommunurnar og tey sosialu áhugafeløgini.

**Viðmerkingar:**
Tað, at byggja og reka ellis- og røktarheim, vistar- og umlættingarheim, vardar íbúðir og vard verkstøð, vøggustovur og barnagarðar, at fyriskipa dagrøkt av børnum og at fyriskipa øðrum sosialum tiltøkum, eru kommunalar uppgávur, ið fáa fíggjarligan stuðul úr ávikavist landskassanum og ríkiskassanum.

Í Føroyum hava vit 50 kommunur. Tær flestu av kommununum eru so smáar, at tær hvør í sínum lagi ikki hava møguleika fyri ella umstøður til at byggja og reka umroddu sosialu stovnar og heldur ikki at fyriskipa øðrum sosialum tiltøkum. Tær hava hvørki fólkagrundarlag ella fíggjarligt grundarlag til tess at fara undir hesi tiltøk hvør fyri seg.

Ein avleiðing av hesum er, at tey menningartarnaðu mugu flyta úr teirra heimliga umhvørvi til høvuðsstaðin, tá tað einans er høvuðsstaðurin, sum kann bjóða vardar íbúðir, vard verkstøð, vistar- og umlættingarheim, undirvísing og heilsurøkt til hesi fólkini. Ein onnur avleiðing er, at húsmøður úti um landið kunnu vera arbeiðsleysar, hóast arbeiði er í bygdini ella nærhendis, tá tær ikki kunnu fáa børnini passað. Og ein triðja avleiðingin er tann, at í 47 av teimum

50 kommununum kunnu fólk ikki fáa sosiala ráðgeving aðrastaðir, enn frá tí centralu almannaumsitingini í høvuðsstaðnum.

Javnaðarflokkurin hugsar sær eina lóg um sosialar eindir, har kommunur innan fyri nærri avmarkaði økir, t.d. kommunurnar innan fyri hvørt av teimum 11 læknadømunum, verða skipaðar í sosialar eindir, at heilsumiðstøðirnar í teimum 11 læknadømunum koma at virka sum almanna- og heilsumiðstøðir, at sosialráðgevari verður í hvørjari eind, at hesir verða knýttir at heilsu- og almannamiðstøðunum, at kommunurnar í teimum sosialu eindunum velja eina felags sosiala nevnd, sum í samráð við avvarðandi kommunur og landsmynduleikarnar fyriskipar bygging og rakstur av teimum sosialu stovnunum.

Javnaðarflokkurin metir, at tað er av ómetaliga stórum týdningi, at brekað fáa møguleika fyri at búgva og arbeiða í teirra heimliga umhvørvi, og at hesi í størst møguligan mun eisini kunnu fáa undirvísing har. Flokkurin metir, at ein lóg um sosialar eindir, verður ein hóskandi karmur um eina betri tilveru hjá hesum fólkum. Vit meta eisini, at ein slík lóg verður neyðug, um tann komandi endurbúgvingarstovnurin skal virka væl og koma øllum teimum til góðar, ið hava brúk fyri hesum stovni, uttan mun til hvar í landinum tey búgva.

Tá flokkurin ikki setur lógaruppskot fram í hesum máli, so kemst tað av, at vit halda tað vera skeivt at fremja slíkt lógarsmíð yvir høvdið á kommunum og áhugafeløgum á sosiala økinum og tí seta vit fram uppskot til samtyktar, har landsstýrinum verður álagt at fremja hetta lógarsmíð í samráð við nevndu stovnar og feløg.

Javnaðarflokkurin legði hetta mál fram 25. mars 1981. Eftir tilmæli frá sosialu nevnd samtykti løgtingið 6. apríl 1981 at áleggja landsstýrinum at gera uppskot til løgtingslóg um sosialar og heilsuligar eindir. Landsstýrið fekk álagt at leggja hetta uppskot fyti tingið, áðrenn tingsetan 1982 endaði. Tá einki er komið frá landsstýrinum eru loyvir javnaðarflokkurin sær at leggja málið fram av nýggjum.

1. viðgerð 20 mars. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 8. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er lagt fram av Javnaðarflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 20. mars 1984 beint í sosialu nevndina.

Nevndin ger vart við, at einsljóðandi uppskot er samtykt í løgtingsmáli nr. 59/1980. Nevndin minnir landsstýrið á hesa samtykt og sendir tí landsstýrinum málið.

2. viðgerð 8. mai. Málið avgreitt uttan atkvøðugreiðslu.

---

# 73. Broyting í lóg um ráfiskagrunn.

Ár 1984, týsdagin 20. mars legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt at seta nevnd við umboðum fyri Meginfelag Útróðrarmanna, Føroya Fiskimannafelag og Føroya Ráfiskakeyparafelag við tí endamáli at endurskoða lógina um ráfiskagrunnin, serliga við tí fyri eyga at fáa grunnin at virka rættvísari, at gera studningsveitingarnar einfaldari og at flyta ráfiskagrunnin yvir í søluliðið.

**Viðmerkingar:**
Tað eru nú liðin níggju ár síðani ráfiskagrunnurin fór at virka. Endamálið við grunninum var at stuðla avreiðingarprísirnar og at tryggja ein javnan avreiðingarprís yvir eitt longri tíðaeskeið.

Sum kunnugt ásetir nevndin fyri ráfiskagrunnin avreiðingarprísir fyri ávís tíðarskeið. Munurin í millum avreiðingarprísirnar og av-

rokningarprisirnar verða síðani útlíknaðir millum grunnin og virkini ella fiskakeypararnar.

Tá samráðingar í síni tíð vóru um skipan av ráfiskagrunninum, vóru flokkarnir ójavnir á máli um, hvar grunnurin skuldi liggja. Stríðið stóð um, annaðhvørt grunnurin skuldi liggja í virkisliðinum ella í søluliðinum, men tá fekst politiskur meiriluti ikki fyri at leggja grunnin í søluliðið við tí úrsliti, at grunnurin varð lagdur í virkisliðið.

Javnaðarflokkurin metti og metir framvegis, at tað hevði verið rættari, um ráfiskagrunnurin varð lagdur í søluliðið, tá hetta fyri tað fyrsta vildi gjørt studningsveitingarnar einfaldari og fyri tað næsta vildi tryggjað vinnuni og tí almenna størri innlit í fiskasølumál.

Um hesi viðurskifti verður m.a. sagt í samgonguskjalinum hjá hesi samgonguni: »Studningsskipanin til fiskivinnuna og lógin um ráfiskagrunnin skulu endurskoðast og gerast einfaldari. Sum lið í hesum verður umhugsað, um stuðulin kann leggjast í annað lið enn í verandi skipan.«

Eftir uppskoti frá landsstýrinum samtykti løgtingið í tingsetuni 1982 ymiskar broytingar í lógini um ráfiskagrunnin. Har var kortini einki uppskot um at leggja grunnin í annað lið enn verandi skipan. Broytingarnar gjørdu, at ráfiskagrunnurin sum heild virkar verri, enn hann gjørdi frammanundan. Við virki sínum fremur grunnurin órættvísi ímóti ávísum bólkum av veiðumonnum. Broytingarnar førdu m.a. við sær, at stýringin av fiskiskapinum á landleiðini nú er løgd í hendurnar á stýrinum fyri ráfiskagrunnin, og tað er hervið at órættvísið verður framt.

Tað er bæði rætt og neyðugt, at vit stýra fiskiskapinum á landleiðini. Men javnaðarflokkurin kann ikki taka undir við, at tað verður gjørt á hendan hátt. Støðan er nevniliga tann, at ávísir bólkar av veiðumonnum, ið framman undan fáa minst burtur úr, nú skulu gjalda fyri hesa stýring.

Um ráfiskagrunnurin framyvir skal virka á sama hátt, verður hetta virksemið at geva heimaútróðrinum og serstakliga húkaveiðuni mønustingin, og hetta metir javnaðarflokkurin so mikið álvarsamt, at flokkurin mælir til, at lógin um ráfiskagrunnin verður endurskoðað beinan vegin.

1. viðgerð 26. mars. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi:

**Álit**

Málið er lagt fram av Javnaðarflokkinum 20. mars 1984 og við 1. viðgerð 26. í s.m. beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Fredrik Olsen, Øssur Dam Jacobsen, Arne Ziskasen og Jógvan I. Olsen) setir eingi uppskot fram.

Minnilutin (Tórálvur M. Olsen, Hans M. Joensen og Juul Jacobsen) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 7. mai. Uppskotið fall við 16-0 atkvøðum.

---

# 74. Javnføring av fólka-, avlamis og einkjupensjón v.m.

Ár 1984, fríggjadagin 16. mars legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt beinan vegin at fáa í lag samráðingar í felags sosialu nevndini við tí fyri eyga at fólka-, avlamis- og einkjupensjónirnar v.m. verða javnførdar skjótast gjørligt. Hesar samráðingar skulu eisini umfata broyting í lógini um avlamispensjón til tað, sum er galdandi í Danmark.

**Viðmerkingar:**
Aftaná drúgvar tingingar í felags sosialu nevndini gjørdi undanfarna landsstýrið í oktober 1980 semju við ríkismyndugleikarnar um at javnføra fólka-, avlamis- og einkjupensjónirnar v.m. Hendan semja umfataði eisini munandi broytingar í lógini um almenna forsorg.

Hóast henda semja varð gjørd í oktober 1980, komu hesar javnføringar av pensjónunum ikki í gildi fyrr enn 1. apríl 1981. Umrøddu broytingarnar í forsorgarlógini komu ikki í gildi fyrr enn 1. juli 1983. Javnaðarflokkurin hevur ført eftir ført átalað hetta óneyðuga dráil frá landsstýrisins síðu.

Semjan frá 1980 førdi pensjónsupphæddirnar ájavnt við tað, sum var galdandi í Danmark í 1979. T.v.s. at javnføringarnar longu vóru trý ára gamlar, áðrenn tær fóru at virka. Í dag hava hesar javnføringar longu fimm ár á baki. Soleiðis sum dýrtíðin hevur innanholað allar lønir í samfelagnum og serstakliga, tá hugsað verður um teir støðugt hækkandi vøruprísirnar og prísirnar á ymiskum tænastum, er tað rímiligt, at tær sosialu pensjónirnar aftur nú verða javnførdar við gildi frá 1. apríl 1984.

Uppskotið umfatar eisini broyting í galdandi pensjónslóggávu, soleiðis at tey, sum higartil hava ligið á lægsta stigi í avlamispensjón, koma at liggja ájavnt teimum, sum eru á øðrum stigi. Hetta er galdandi í Danmark aftaná seinastu broytingarnar í sosialu lógunum har.

Javnaðarflokkurin heldur tað somuleiðis vera rímiligt, at fólkapensjónin hjá hjúnum verður broytt soleiðis, at hendan samsvarar við upphæddirnar, sum eru galdandi í danska samfelagnum. Tað vil siga, at hjúnapensjónin, sum í dag er kr. 48.204 + pensjónsískoyti kr. 7.740,- ella tilsamans 55.944,-, verður hækkað til kr. 61.224,- + pensjónsískoyti kr. 12.576,- ella tilsamans kr. 73.800,-.

Livikostnaðurin er nógv hækkaður seinastu árini. Skatta- og tollbyrðan er nógv økt, og tað sama kann sigast um almennu gjøldini. Í dag er tað torført hjá nógvum húsarhaldum at fáa peningin at røkka til, og er tað serstakliga torført hjá fólki, ið bert hava eina sosiala pensjón — fólka-, avlamis- ella einkjupensjón at liva av.

Út frá hesum grundgevingum loyvir Javnaðarflokkurin sær at seta fram hetta uppskot til samtyktar.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er lagt fram av Javnaðarflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 23. mars 1984 beint í sosialu nevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jógvan Sundstein, Fredrik Olsen og Eli Nolsøe) metir, at hetta er eitt mál, sum landsstýrið hevur ábyrgd av, og setir tí einki uppskot fram.

Minnilutin (Karin Kjølbro) setir fram soljóðandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt beinanvegin at bera so í bandi, at allar pensiónir í Føroyum verða eins stórar og tær í grannalondunum.

Minnilutin (Jóannes Dalsgaard) tekur undir við uppskotinum frá Javnaðarflokkinum.

2. viðgerð 8. mai. Minnilutauppskot frá nevndini fall við 14-0 atkvøðum.

---

# 75. Alment kunngerðablað.

Ár 1983, fríggjadagin 16. mars legði Jóannes Dalsgaard, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

# Uppskot til

## løgtingslóg um alment kunngerðablað.

§ 1. Frá 1. oktober 1984 stílar landsstýrið fyri útgávu av einum almennum kunngerðablaði: Kunngerðablaðið.

§ 2. Í kunngerðarblaðið skulu allar løgtingslógir og kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur givnar av landsstýrinum, lýsast.
*2. stk.* Í kunngerðablaðið kunnu eisini upptakast:
a. Lýsingar, fráboðanir o.t. frá tí almenna.
b. Kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur frá øðrum almennum stovnum enn landsstýrinum og fráboðanir frá privatum í rættarviðurskiftum.

§ 3. Frá 1. oktober 1984 er lýsingin í Kunngerðablaðnum einasti bindandi kunngerðarháttur av løgtingslógum v.m. eftir § 2, 1, stk. Verða tær í § 2, 2. stk. nevndu kunngerðir v.m. lýstar í Kunngerðarblaðnum, hevur lýsingin sama lóggildi, sum lýsing av løgtingslógum v.m., hesin kunngerðarháttur er tó eingin treyt, um viðkomandi løgtingslóg sjálv ikki krevur hann.

## lagtingslov om en offentlig kundgørelsestidende.

§ 1. Fra 1. oktober 1982 udgives ved landsstyrets foranstaltning en offentlig kundgørelsestidende: »Kunngerðablaðið«.

§ 2. I »Kunngerðablaðið« indføres såvel alle lagtingslove som kundgørelser, reglementer og andre offentlige forordninger.
*2. stk.* I »Kunngerðablaðið« kan også indføres:
a. Annoncer, meddelelser o.l. fra det offentlige.
b. Kundgørelser, reglementer og andre offentlige forordninger i det hele taget fra andre offentlige institutioner end landsstyret, samt meddelelser fra private i retsforhold.

§ 3. Fra 1. oktober 1982 er optagelsen i »Kunngerðablaðið« den eneste bindende kundgørelsesmåde for lagtingslove m.v., som nævnt i § 2, stk. 1. Såfremt de i § 2, stk. 2 nævnte kundgørelser m.v. optages i »Kunngerðablaðið«, har optagelsen samme lovkraft, som optagelse af lagtingslove m.v., denne kundgørelsesmåde er dog ingen betingelse, med mindre den er

*2. stk.* Tá ið einki stendur tilskilað í løgtingslógini v.m. kemur hon í gildi vikudagin eftir dagin, tað nummarið av Kunngerðablaðnum, sum hon stendur í, er givið út.

*Stk. 2.* Med mindre andet er foreskrevet i vedkommende lagtingslov m.v., træder denne i kraft ugedagen efter det nummer af »Kunngerðablaðið«, som denne er optaget i, er udkommet.

**§ 4.** Kunngerðablaðið kemur út so ofta tørvur er, tó í minsta lagi eina ferð hvønn mánað.
*2. stk.* Hvørt nummar skal tilskila dagin, tað kemur út.

**§ 4.** »Kunngerðablaðið« udkommer så ofte, som der er behov herfor, dog mindst en gang om måneden.
*Stk. 2.* Hvert nummer skal angive udgivelsesdagen.

**§ 5.** Alt yvirvald, sorinskrivarin, postverk og kommunustýrir fáa ókeypis eintak av Kunngerðablaðnum.

**§ 5.** Al øvrighed, sorenskriver, postvæsen og kommunalbestyrelser får tilstillet eksemplar af »Kunngerðablaðið« uden betaling.

**§ 6.** Landsstýrið fyrisetir gjøllari reglur fyri útgávuni, útsjónd, lýsingarprís o.t., eins og landsstýrið gevur út Kunngerðablaðið, har tær løgtingslógir v.m., nevndar í § 2, 1. stk. verða uppteknar. Eisini kunnu kunngerðirnar v.m. eftir § 2, 2. stk. og lógirnar v.m. eftir § 7, takast við í savnið.

**§ 6.** Landsstyret foreskriver nærmere regler for udgivelsen, udseende, abonnement, o.l. ligeledes udgiver landsstyret et »Kunngerðablaðið«, hvori optages de lagtingslove m.v. omhandlet i § 2, stk. 1. Kundgørelserne m.v. efter § 2, stk. 2, og lovene m.v. efter § 7 kan endvidere optages i samlingen.

**§ 7.** Landsstýrinum er heimilt eftir avtalu við ríkisstýrið ella ríkismyndugleikar og aðrar myndugleikar í Kunngerðablaðið at upptaka lógir, kunngerðir, lýsingar o.t.

**§ 7.** Landsstyret bemyndiges til efter aftale med regeringen eller rigsmyndighederne og andre myndigheder at optage i »Kunngerðablaðið« love, kundgørelser, meddelelser o.l.

**Viðmerkingar:**
Spurningurin um at seta á stovn alment kunngerðablað hevur fleiri ferðir verið frammi á løgtingi í tíðarskeiðinum 1918—1982, men ongantíð er hetta mál framt.

Sum kunnugt verða allar almennar lógir, fyriskipanir, kunngerðir, og hvat almennar reglur annars eru nevndar í Føroyum, kunngjørdar í einum privatum blaði, ið hevur fingið góðkenning sum alment lýsingarblað.

Henda støða má í dag metast at vera óheppin sæð frá mongum sjónarmiðum. Landsins borgarar hava jú sum fremstu borgaraskyldu at halda landsins lógir. Fyri at kunna kenna lógirnar eru borgararnir tvungnir til at halda eitt ávíst blað, ið er ogn hjá einum privatum partafelag, umframt at blaðið er ógvuliga nær knýtt at ávísum politiskum flokki. Afturat hesum kemur, at innihaldið í hesum blaðið ofta er av slíkum slagi, at tað stríðir ímóti tí, vit vanliga kalla upplýsandi tilfar, og tað má tí metast at vera lítið sømiligt fyri tað almenna at brúka hetta blað, Dimmalætting, sum alment lýsingarblað.

Javnaðarflokkurin metir tað ikki at vera haldgott fyri fólkaræðið og fyri umdømi hins almenna í longdini at halda fram við at brúka Dimmalætting sum alment kunngerðarblað og leggur tí fyri løgtingið uppskot um alment kunngerðarblað í vónini um, at hetta uppskot fer at fáa eina betri lagnu enn líknandi uppskot áður hava fingið.

Uppskotið er at kalla einsljóðandi við uppskot nr. 104/1981.

1. viðgerð 21. mars. Málið var beint í lóganevndina, sum 8. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð framlagt av Javnaðarflokkinum 16. mars 1984 og við 1. viðgerð 21. s.m. beint í lóganevndina.

Eftir uppskotinum skal almenna kunngerðablaðið innihalda allar løgtingslógir og kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir, givnar av landsstýrinum, umframt at upptakast kunnu allar lýsingar og fráboðanir o.t. frá øllum almennum stovnum undir heimastýrinum. Haraftrat kunnu upptakast fráboðanir frá privatum í rættarviðurskiftum, og um avtala verður gjørd við ríkismyndugleikarnar, so eisini ríkislógir og lýsingar o.t. frá statsstovnum.

Eftir núgaldandi reglum skulu allar løgtingslógir og kunngerðir frá landsstýrinum lýsast í Dimmalætting. Blaðið ger hetta ókeypis. Lýsingar og fráboðanir frá almennum stovnum verða settar í øll bløð, sum koma út í minsta lagi eina ferð um vikuna, og verður fyri hetta goldin vanligur lýsingartakstur.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í tríggjar minnilutar.

Minnilutin (Asbjørn Joensen og Arne Ziskasen) kann av serliga politiskum orsøkum ikki taka undir við uppskotinum.

Minnilutin (Agnar Nielsen) setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jákup Lindenskov og Petur Reinert) mælir til at samtykkja uppskotið til løgtingslóg um almennt kunngerðablað.

2. viðgerð 8. mai. Uppskotið fall við 13-0 atkvøðum.

---

# 76. Lóg um burturkoyring av mold til sjós.

Ár 1984, fríggjadagin 16. mars legði Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**

**løgtingslóg um bann móti burturkoyring av mold til sjós.**

§ 1. Tað er bannað at forkoma mold, leiri og øðrum tilfari frá

**lagtingslov om forbud mod at dumpe jord i havet.**

§ 1. Det er forbudt at bortsmide jord, ler og andet materiale fra

útgrevstri, vegagerð og tílíkum við at koyra slíkt tilfar til sjós.

udgravninger, vejarbejder o.l. ved at køre disse materialer i havet.

§ 2. Landsstýrið áleggur býráðum og øllum sóknarstýrum kring landið at ávísa øki, har mold og annað tilfar frá útgrevstrum, vegagerð og tílíkum kann leggjast.

§ 2. Landsstyret pålægger byrådene og samtlige kommunalbestyrelser at udpege områder, hvor jord og andet materiale fra udgravninger, vejarbejder o.l. kan henlægges.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Bøur og dyrkað lendi er ikki tað, vit nakrantíð hava átt ella framvegis eiga mest av og minkar hetta stórliga ár um ár. Í flestu stórplássum er longu nú stórur partur av bøi farin til húsagrundir og vegagerð. Sum tíðirnar og umstøður eru, verður lítil og eingin hagi veltur til bø.

Síggjast kann tí fram til tann dag, har ølt dyrkaða jørðin á summum plássum soleiðis verður at hvørva heilt.

Tíverri hevur verið og er enn tann siður nýttur kring landið, at tá grivið verður út til húsagrundir ella tílíkt, verður allur hesin útgrevstur koyrdur til sjós (á Bukkvald). Millum ár og dag snýr hetta seg um nógv túsund tons, sum vit sostatt beina fyri. Verður hildið fram á hendan hátt, hava vit skjótt forkomið tí sindri av mold, sum okkara forfedrar við ómenniskjansligum stríði, strevi og knossi skaptu burtur úr ringum hagalendi.

Vit mugu eisini síggja fram til tann dag, hvar nýggir kirkjugarðar verða neyðugir, og hvar komandi ættarlið fara undir at gera grønar vøllir og urtagarðar o.t., ið vit hava forkomið, men tá er eingin mold til. Vit, sum vóru áðrenn, hava í kortskygni koyrt hana í havið.

Tí má betri loysn fáast í lag enn at blaka alt til sjós.

Nógv av hesum tilfari kann nýtast til ífylling fram við strendur ella uppi á landi til planering og tílíkt. Á flestu plássum eru eisini stór niðurløgd leirhol, ið kundu goymt væl av hesum tilfari til seinri nýtslu.

Málið varð í hesum líki framlagt 10. februar 1972 av Ova Mikkelsen, fekk fyrstu viðgerð 8. mars og varð beint í lóganevndina, kom aftur á tingborð 16. mars og fall við 2. viðgerð 11. apríl 1972.

Hin vegin varð fylgjandi uppskot til samtyktar, sum lóganevndin setti fram, samtykt, nevniliga:

»Heitt verður á landsstýrið at áleggja Tórshavnar Býráð og øllum sóknarstýrunum at ávísa øki, har mold og annað tilfar frá útgrevstrum, vegagerð og tílíkum kann leggjast, og annars ansa eftir, at nevnda tilfar verður lagt á tey ávísu øki.«

Vit vita jú øll, at hetta uppskot, sum varð samtykt, yvirhøvur ikki hevur virkað eftir ætlanini í lógaruppskotinum og gjøgnum hesi 12 árini eru milliónir av kubikkmetrum av slíkum tilfari koyrd í havið. Kommunurnar siga, at tær hava einki pláss at ávísa, og teir, ið grava út, siga, at tað er ov dýrt at koyra til ávíst pláss, so óskilið heldur bara fram, ja kanska meir nú enn nakrantíð áður.

Tað sigst, at landsverkfrøðingurin sýtir fyri, at slíkt tilfar verður vippað oman av vegnum, har lendið er hóskandi, tí hetta skal tarna ferðsluni og gera hana ótrygga. Slík undanførsla kann ikki góðtakast, tí tað ber til at avmerkja vegin nakað tí megin, har slíkt tilfar verður vippað omanav jaðaranum, eins og ein sjálvfylgilig treyt er, at um nakað av vegnum er dálkað, so má hetta reinsast, tá liðugt er fyri dagin, og avmerkingarnar mugu takast av vegnum. So »áheitan« og »gerið so væl« nyttar einki í hesum føri. Her má lógarsamtykt til, um tingið vil hugskotinum væl, eins og reglugerð sigur, at slíkt tilfar kann koyrast beinleiðis av vegnum fram við jaðarin.

Spurningurin er jú, um hvussu leingi vit hava ráð til at oyða hesar klettar fyri mold, og vit tingmenn góðtaka hetta, og sostatt geva komandi ættarliðum bert nakrar naknar steinklettar í arv, har einki grønt longur prýðir landið.

Og tí verður málið nú aftur 12 ár scinri lagt fyri tingið í tess upprunaliga líki.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint í lóganevndina, sum 3. apríl 1984 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð framlagt av Tjóðveldisflokkinum 16. mars 1984 og við 1. viðgerð 23. í s.m. beint í lóganevndina.

Í viðmerkingunum til uppskotið verður m.a. víst á, at stórur partur av dyrkaðum lendi fer til húsagrundir og vegagerðir, og at øll moldin og allur eyrur verður koyrdur til sjós.

Í tingmáli nr. 50/1970 samtykti løgtingið soljóðandi uppskot til samtyktar:

Heitt verður á landsstýrið at áleggja Tórshavnar býráð og øllum sóknarstýrum eitt ávíst øki, har mold og annað tilfar frá útgrevstrum, vegagerð o.t. kann leggjast og annars at ansa eftir, at nevnda tilfar verður lagt á tey økini.

Landsstýrið hevur gjørt øll býráð og bygdaráð varug við nevndu samtykt og heitt á tey um at gera neyðug tiltøk, so løgtingssamtyktin kundi fremjast og at ansa eftir, at hon varð fylgd.

Samtyktin hevur víst seg ikki at virka eftir ætlanini og verður tí mett neyðugt at áleggja skylduna við løgtingslóg.

Nevndin hevur viðgjørt málið og kann taka undir við uppskotinum, men metir at tað verður neyðugt við lógini at hava straffireglur og heimild til landsstýrið í kunngerð at áseta nærri reglur um fremjing av lógini.

Sostatt setir nevndin fram fylgjandi

### broytingaruppskot

§ 2 verður orðað soleiðis:

»Øll býráð og bygdarráð hava skyldu til at ávísa øki, har mold og tilfar frá útgrevstrum og veggerð o.t. kann leggjast.«

§ 2 affattes således:

»Alle byråd og bygderåd er pligtige til at anvise areal, hvor jord og andet materiale fra udgravninger og vejarbejder o.l. kan opbevares.«

§ 3 verður orðað soleiðis:

»Landsstýrið kann við kunngerð áseta aðrar reglur um útinning av lógini.«

§ 3 affattes således:

»Landsstyret kan ved bekendtgørelse fastsætte nærmere bestemmelser om lovens gennemførelse.«

§ 4 verður orðað soleiðis:
»Brot á reglurnar í § 1 og á reglurnar, ásettar við heimild í § 3 verða revsað við bót.«

§ 4 affattes således:
»Overtrædelse af bestemmelserne i § 1 de bestemmelser, som landsstyret fastsætter i medfør af § 3 straffes med bøde.«

§ 5 verður orðað soleiðis:
»Henda lóg kemur í gildi 1. juli 1984.«

§ 5 affattes således:
»Denne lov træder i kraft 1. juli 1984.«

2. viðgerð 6. apríl 1984. § 1 varð samtykt við 18-1, broyting til § 2 samtykt við 19-0, § 2 soleiðis broytt samtykt við 18-0, § 3 samtykt við 18-0, nýggja § 4 samtykt við 18-0 og § 5 uttan atkvøðugreiðslu. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 19-2 atkvøðum.

3. viðgerð 1. mai. Málið endaliga samtykt við 24-1 atkvøðum.

Lóg nr. 77 frá 12. juli 1984.

---

# 77. Lóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima.

Ár 1984, fríggjadagin 16. mars legði Jákup Lindenskov, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot
til**

**løgtingslóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima.**

§ 1. Úr landskassanum verður veitt viðurlag til fólk, sum átaka sær at ansa eldri og óhjálpnum fólki heima, tá tørvur er á støðugari røkt og hjáveru.
*2. stk.* Viðurlagið er tað sama sum einkjupensjónin við fullari uppískoytisveiting.
*3. stk.* Viðurlagið er treytað av, at móttakarin ikki í størri mun átekur sær annað lønandi arbeiði.
*4. stk.* Viðurlag heldur uppat, um tann óhjálpni verður innlagdur á sjúkrahús í meir enn ein mánað.

§ 2. Viðurlag verður goldið av Føroya Gjaldstovu. Lógin verður umsitin av Almannastovuni.
*2. stk.* Avgerðir, sum verða tiknar av Almannastovuni, kunnu innan 4 vikur skjótast inn fyri landsstýrið.
*3. stk.* Landsstýrið setir nærri reglur fyri, hvussu henda lóg verður umsitin.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi 1. juli 1984.

**lagtingslov om vederlag for pleje af ældre og hjælpeløse personer hjemme.**

§ 1. Der kan af landskassen ydes vederlag til personer, der påtager sig hjemme at passe hjælpeløse personer, der har behov for vedvarende pleje og tilstedeværelse af andre.
*Stk. 2* Vederlaget er af samme størrelse som fuld enkepension med fuld tillægsydelse.
*Stk. 3.* Vederlag er betinget af, at modtageren ikke påtager sig andet lønarbejde i væsentligt omfang.
*Stk. 4.* Vederlaget ophører, såfremt vedkommende hjælpeløse person indlægges på sygehus i mere end en måned.

§ 2. Vederlag udbetales af Gjaldstovan. Iøvrigt administreres loven af Almannastovan.
*Stk. 2.* De af Almannastovan trufne afgørelser kan inden 4 uger indbringes for landsstyret.
*Stk. 3.* Landsstyret kan fastsætte nærmere regler om lovens administration.

§ 3. Denne lov træder i kraft den 1. juli 1984.

**Viðmerkingar:**
Tað er nógv, sum talar fyri, at nakað munagott má gerast fyri fólk, sum av heilsuávum eru vorðin so óhjálpin, at tey ikki klára seg í egna heimi sínum, uttan so at støðug hjálp er í húsinum.

Hjá hesum óhjálpnu fólkum er ofta einki annað at gera uttan at fara heimanfrá.

Hetta er partvís ein avleiðing av broytta búsetingarmynstrinum og arbeiðslagnum, sum merkir nútíðarsamfelagið meira og meira.

Um ikki næstrafólk ella onnur góð fólk taka tann, sum er óhjálpin til sín, so er einasti útvegurin ofta uppíhaldsdeild á sjúkrahúsi ella røktarheimi. Og hetta er ikki altíð tað, sum mest er ynskjandi og heldur ikki altíð gjørligt.

Fyri at bøta um støðuna hjá tí óhjálpnu menniskjuni, sum mest av øllum ynskir at vera í egna heimi sínum, men ikki kann tað uttan støðuga hjáveru av øðrum fólki, skjýtur Javnaðarflokkurin upp, at óhjálpnum kann veitast viðurlag til hjálparfólk.

Hóast vit hava munagóða primera hjálpartænastu — sum er heimahjálp, heimasjúkrasystir og kommunulækni - so er tað ongantíð so, at primera heilsutænastan kann geva neyðuga hjálp allar 24 tímarnar í samdøgrinum. Men rúmka vit fyri veiting av viðurlagi til hjálparfólk, kann ansingarspurningurin í mongum førum loysa eina trupla støðu, samstundis sum tað er tann fíggjarliga besta loysnin fyri samfelagið.

Í løtuni veitir heimahjálpin stuðul í meira enn 800 heimum kring í landinum, av hesum veitingum eru meira enn 200 í heimum, har hjálp eisini verður veitt um vikuskiftimi.

Í meira enn 30 av hesum megu tvær heimahjálpir vera í senn. Tað er einki at ivast í, at ein loysn við hjálparfólki fer at vera munagóð í fleiri førum umframt at vera væl ódýrari fyri samfelagið enn pláss á ansingarheimi.

Í lógaruppskotinum verður mett, at viðurlagið skal vera treytað av, at hjálparfólk ikki átekur sær annað munandi arbeiði. Hetta er at skilja so, at tílík hjálp ikki skal hava annað arbeiði meira enn hálvan dag.

Skotið verður upp, at viðurlagið verður tað sama sum veitt verður í einkjupensjón við fullum uppískoytum. Tað er í løtuni 4.310,- um mánaðin. Útreiðslan til hesa nýskipan verður mett til kr. 5.000.000 árliga.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er lagt fram á ting av Javnaðarflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 23. mars 1984 beint í sosialu nevndina.

Tað, sum málið snýr seg um, hevur stóran samfelagsligan týdning, við tað at tað beinleiðis ávirkar og niðursetir tørvin á røktarheimsplássum. Men uppaftur størri týdning hevur tað fyri tann einstaka persónin, sum raktur verður av sjúku og óhjálpni, og tí kanska um møguleikar eru hjá familjufólki at taka sær av viðkomandi kunnu verða í heimligum umhvørvi.

Ein slík skipan, sum tann, ið her er skotin upp, ger røktina biligari fyri tað almenna, meðan sjúklingurin í flestu førum fær betri røkt enn á røktarheimi ella um heilt fremmand og skiftandi persónar skulu taka sær av honum.

Nevndin uppfatar definitatiónina av sjúklingunum í § 1, stk. 1, sum ein persón, ið av lækna verður mettur sum røktarsjúklingur.

Tá ið sagt verður í § 1. stk. 3, at móttakarin ikki í størri mun átekur sær annað lønandi arbeiði, metir nevndin, at hetta ikki er til hindurs fyri t.d. einum hálvdagsstarvi ella partvísum arbeiði á t.d. einum flakavirki.

Nevndin metir lógina sum eina rammulóg, og at landsstýrið eftir § 2, 3. stk. eigur at gera eina nágreiniliga reglugerð fyri, hvussu skipanin skal umsitast.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan Sundstein, Eli Nolsøe, Karin Kjølbro og Jóannes Dalsgaard) tekur við hesum viðmerkingum undir við lógaruppskotinum.

Minnilutin (Fredrik Olsen) tekur ikki undir við málinum, men setir einki uppskot fram.

2. viðgerð 8. mai. §§ 1 og 2 vórðu samtyktar við 30-0, § 3 uttan atkvøðugreiðslu. At fara solciðis til 3. viðgerð samtykt við 30-0 atkvøðum.

3. viðgerð 9. mai. Málið endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

Lóg nr. 64 frá 5. juni 1984.

# 78. Broyting í skattalógini.

Ár 1984, fríggjadagin 16. mars legði Finnbogi Isaksen, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 118 frá 29. december 1983 um skiftisreglur í samband við samtíðarskatt.

§ 1. Í 2. kapitli, 3. grein verður sett sum nýtt pkt. 4:

»Persónur, sum hevur goldið meira rentur av føstum lánum í 1983 enn 1984, kann draga munin frá sum privatar rentur í tí inntøkuskatti, sum latin verður í inntøkuárinum 1985.«

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om ændringer i lagtingslov nr. 118 af 29. december 1983 om overgangsbestemmelser ved indførelse af kildeskat.

§ 1. I kapitel 2, § 3 indføres som nyt pkt. 4:

»Personer, som har betalt flere renter af faste lån i 1983 end 1984, kan trække differencen fra som private renter i den indkomstskat, der skal betales i indkomståret 1985.«

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar.**

Um fáar dagar kemur samtíðarskatturin í gildi. Broytingarnar í mun til galdandi skattalóg eru sera nógvar og stórar, og tí kann enn ikki sigast við vissu, hvussu skipanin fer at virka.

Tað er tó longu nú greitt, at fólk, t.d. sethúsbyggjarar, sum rindaðu meiri rentur í 1983, enn tey fara at rinda í 1984, vera fyri vanbýti. Hetta kemst av, at sambært lóg um skiftisreglur í sambandi við samtíðarskattin, verða privatar rentur frá 1983 als ikki taldar við.

Tey 300 til 400 fólkini, sum bygdu sær nýggj hús í 1983, mundu í flestøllum førum rinda meira í byggirentum, enn tey rinda í 1984, tá lánini eru prioriterað og rentan lægri.

Fyri at hesi fólk ikki skulu vera fyri vanbýti verður her skotið upp, at munurin millum rentuna í 1983 og 1984 skal kunna dragast frá í 1985.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint í skattanevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð framagt 16. mars 1984 av Tjóðveldisflokkinum og varð undir 1. viðgerð beint í skattanevndina.

Skotið verður upp, at persónar, t.d. sethúsabyggjarar, sum gjalda meir rentu í 1983, enn tey fara at gjalda í 1984, fáa loyvi at draga munin frá í tí inntøkuskatti, sum latin verður inn í inntøkuárinum 1985.

Nevndin hevur undir viðgerðini av málinum býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eli Nolsøe, Jógvan Sundstein og Hilmar Kass) setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Vilhelm Johannesen og Finnbogi Isaksen) mælir til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 7. mai. Atkvøðugreiðslan 8. mai. Uppskotið frá Tjóðveldisflokkinum fall við 14 ja-atkvøðum, 16 atkvøddu ikki og 2 vóru burturstaddir. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Juul Jacobsen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Beck, Jørgen Thomsen, Jákup Lindenskov, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans Marius Joensen.

Atkvøddu ikki: Anfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Óssur Dam Jacobsen, Svend Age Ellefsen, Edmund í Garði, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein.

Burturstaddir: Hilmar Kass, Adolf Hansen

# 79. Loyniliga ameriska lurtistøðin í Mjørkadali.

Ár 1984, fríggjadagin 16. mars legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur marknaðarnevndini at kanna allar tær upplýsingar, ið nú eru framkomnar um loyniliga ameriska lurtistøðina á hernaðarstøðini í Mjørkadali, og sum allra fyrst at leggja úrslitið av hesi kanning fyri løgtingið, ið síðan tekur málið aftur til viðgerðar.

Hjálagt er ljósprent av greinum í blaðnum »Forsvaret«: »USA-base på Færøerne« og »Forpost på Færøerne«.

1. viðgerð 21. mars. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fyri løgtingið av Tjóðveldisflokkinum 16. mars 1984 og undir 1. viðgerð 21. mars 1984 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot Tjóðveldisfloksins.

2. viðgerð 7. mai. § 1 varð samtykt við 18-0 atkvøðum.

# 80. Sínámillum fiskirættindi Føroyar-Ísland.

Ár 1984, fríggjadagin 16. mars legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið góðkennir sínámillum fiskirættindi millum Føroyar og Ísland sambært hjáløgdu skipanir.

**Viðmerkingar:**
Við skrivi dagfest 13. december 1983 segði íslendski uttanríkismálaráðharrin upp skipanina um fiskivinnu undir Íslandi hjá føroyskum skipum, dagfest 20. mars 1976 við seinni broytingum. Uppsøgnin var upp á 6 mánaðir til 13. juni 1984.

Føroya Landsstýri bað tessvegna um samráðingar við íslendsku stjórnina.

Tvey samráðingarumfør hava verið, bæði í Reykjavik, millum umboð fyri Føroya landsstýri og íslendsku stjórnina um sínámillum fiskirættindi.

Undir fyrra samráðingarumfarinum 11. og 12. januar í ár vóru íslendingar als ikki til reiðar at gera nakra nýggja avtalu yvirhøvur.

Undir seinna samráðingarumlagi 8. og 9. mars gjørdist tirslitið viðløgdu 3 skjol.

*Fyrsta skjalið* er ein protokol um atgongd føroyinga til fiskiveiðu við Ísland.

Niðurstøðan varð broyting av samráðingunum dagfestar 20. mars 1976, 10. januar 1979 og 13. januar 1983, og er fylgjandi:

»Íslendskir myndugleikar áseta mest loyvdu veiðimegd, m.a. fyri

tosk, hjá føroyskum skipum hvørt ár, eftir samráðingar við Føroya Landsstýri og havandi í huga støðuna hjá viðkomandi fiskastovnum eins væl og onnur viðurskifti av týdningi fyri báðar partar.«

Hendan broyting verður at skoyta upp í almennu reglurnar í pkt. 4, 1. stk. í løgtingsmáli nr. 117/75 og verða almennu reglurnar tí soljóðandi:

Heildarveiðan hjá føroyskum skipum undir Íslandi má ikki vera hægri enn 17.000 tons upp á ársgrundarlag, og av hesi nøgd má veiðan av toski ikki fara upp um 8.000 tons. Íslendskir myndugleikar áseta mest loyvdu veiðinøgd, m.a. fyri tosk, hjá føroyskum skipum hvørt ár, eftir samráðingar við Føroya Landsstýri og havandi í huga støðuna hjá viðkomandi fiskastovnum eins væl og onnur viðurskifti av týdningi fyri báðar partar.

Føroysk skip, sum fiska undir hesum treytum, skulu lúka somu reglur sum íslendsk skip í somu fiskiveiðu, harímillum reglur um meskastødd í botntroli og flótitroli, minstamát fyri fiskasløg, friðingarøki og reglur um stongd øki.

Føroysku skipini skulu dagliga siga íslendsku sjóverjuni frá, hvar tey eru stødd, meðan tey veiða undir Íslandi.

Henda skipanin undir Íslandi hjá føroyskum skipum kemur í staðin fyri eldri fyriskipan um sama evni og kann verða uppsøgd við 6 mánaða freist av báðum pørtum.

*Annað skjalið* um føroyska botnfiskaveiðu við Ísland í 1984 ber í sær, at íslendskir myndugleikar geva føroyskum skipum loyvi til snøris- og línuveiðu av 8.500 tonsum av botnfiski, og av hesi nøgd skal toskaveiðan ikki fara upp um 2.000 tons.

Í *triðja skjali* um sínámillum rættindi til svartkjaftaveiðu v. m. varð niðurstøðan at veita hvørjum øðrum rættindi at veiða 30.000 tons av svartkjafti innan sjóøki Føroya og búskaparøki Íslands í 1984. Loyvt verður at viðgera veiðuna umborð. Av loyvdu veiðuni hjá íslendsku skipunum á sjóøki Føroya er loyvt at veiða upp til 5.000 tons av makreli í staðin fyri somu nøgd av svartkjafti.

Almennu reglurnar fyri føroyska botnfiskiskapin, serstakliga viðvíkjandi eftirlitsmøguleikunum og fráboðanarskyldu v.m. eru tær somu sum áður, og viðvíkjandi veiðu smb. skjal 3 verður samband millum Føroya landsstýri og íslendska fiskimálaráðið um nærri fyriskipanir.

Sí skjal 12.

1. viðgerð 21. mars. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 16. mars 1984 og við 1. viðgerð 21. mars 1984 beint í Marknaðarnevndina, ið hevur viðgjørt málið.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 13. apríl. Uppskot landsstýrisins samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1500-2-4-3.

---

# 81. Berghol Lopra/Sumba.

Ár 1984, fríggjadagin 16. mars legði Atli P. Dam, løgtingsmaður, vegna Adolf Hansen, Ova Mikkelsen, Hilmar Bech og seg sjálvan fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir, at arbeiðið við bergholsgerð í milluni Lopra og Sumba byrjar beinanvegin, og at sjálv boringin byrjar so tíð-

liga í summar sum møguligt. Boriútgerðin frá Lorvíkarbergholinum verður flutt til Suðuroyar so skjótt neyðugt viðlíkahaldseftirlit er framt.

Í grunninum til berghols- og brúgvagerð, ið m.a. fær 23 mió. kr. av landskassaavlopinum 1982/83 — verða 7,5 mió. kr. avsettar til nevnda arbeiðið.

**Viðmerkingar:**

Figgjarnevndarumboðini Ove Mikkelsen, Adolf V. Hansen og Atli Dam meta Sumbiarbergholið hitt mest átrokandi samferðslumál at loysa í næstum.

Málið hevur verið viðgjørt á tingi fleiri ferðir, síðan lógin um bergholsgerð millum Lopra og Sumba varð samtykt í 1978.

Í fyrispurningum, frágreiðingum og uppskotum til samtyktar er sóknast eftir málinum, síðan tað í 1981 tóktist hvørva í samgongukjakinum, sum tá steðgaði allari bergholsgerð.

Undanfarna samgonga roknaði Sumbiarbergholið í millum tey sokallaðu »primeru« og hevði lagt byggiætlan, sum tryggjaði, at allatíðina fór arbeiði fram við einum »primerum« og einum »sekunderum« bergholi, soleiðis at dýra boriútgerðin støðugt var í nýtslu við »optimalari« nyttu.

Í hesi ætlan lá bergholið millum Lopra og Sumba so frammalaga, at byrjað kundi verið í 1981.

Men eitt svar frá landsstýrismanninum Pálli Vang upp á fyrispurning í løgtinginum avdúkaði, at aftan á samgongukjakið í 1981 var bergholið flutt yvir í tey »sekunderu« og sett so aftarlaga í røðini, at eingi útlit vóru fyri at fremja málið fyrr enn seint í áttatiárunum ella fyrst í nítiárunum.

Tingmonnum stendur greitt hvønn livsneyðugan týdning hendan berghelsgerð hevur. Ikki minst stendur hetta teim greitt í vitskuni aftan á bygdafundin í januar, har tingmenn og landsstýrismaðurin í vegamálum játtaðu at royna at fremja málið í politiskari semju á tann hátt, at kannast skuldi innan samgongunna møguleikar fyri at loysa málið óheft av øðrum politiskum avtalum og ætlanum.

Hendan kanning hevur ikki borið á mál. Heldur ikki royndin at fáa uppskotið frá Adolf Hansen um at seta 11,5 mió. kr. av til endamálið til nýggja viðgerð í figgjarnevndini.

Hetta uppskot, sum varð sett fram í samband við eykafiggjarlógina 1982/83, varð av løgtingsformanninum beint afturí figgjarnevndina 12. mars.

Á tveimum fíggjarnevndarfundum síðani er sóknast eftir málinum og á tí triðja 15. mars sett krav um viðgerð, men er hetta avvíst av umboðum samgongunnar. Frammanundan er svar landsstýrismansins upp á fyrispurning frá Suðuroyar tingmonnum drigið út, og sum tað tykist forhálað í einum taktiskum spæli innan samgonguna. Tí verður nú nýtt uppskot til samtyktar lagt fram.

Sum tað er framgingið av tí almenna kjaki, verið hevur um málið í seinastuni, skuldi meiriluti verið á tingi fyri hesum uppskoti, samanborið við úttalilsir frá formanni fólkafloksins og landsstýrismannintum Pálli Vang, er nú uppskotið samskipað við ætlan teirra og orkuna á fíggjarlógini, og tørvar tí ikki uppskotinum nýggja fíggjarnevndarviðgerð.

Heldur ikki tørvar nevndarviðgerð at møguliga framprioritering av bergholi Kaldbak/Signabø, tí tað stendur greitt, at meðan Sumbiarbergholið er greitt at fara undir, skal projektering fyrst gerast viðvíkjandi Kaldbak/Signabø. Hendan og vegagerð til tunnilsmunnarnar tekur so langa tíð, at tá er boringin Sumba/Lopra liðug.

Tað verður tí mælt frá at beina uppskotið til fleiri nevndarviðgerðir, tí slík roynd vil verða mett sum atkvøða ímóti málinum.

Sambært løgmann hava hvørki landsstýrismaðurin Páll Vang ella fólkaflokkurin áður borið upp á mál í samgonguni at loysa málið.

Skulu hesi úttalilsi løgtnans ikki verða tulkað skeivt, er tí neyðugt, at fólkaflokkurin medvirkar til, at tann meiriluti, sum er fyri málinum, nú fær tað fram.

1. viðgerð 21. mars. Málið varð beint í fíggjarnevndina eftir atkvøðugreiðslu í móti, sum fall við 16-0. Fíggjarnevndin legði 13. apríl fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av løgtingsmonnunum Adolf Hansen, Ove Mikkelsen, Atla P. Dam og Hilmar Bech tann 16. mars 1984 og undir 1. viðgerð tann 21. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilurin (Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Svend Åge Ellefsen og Øssur Dam Jacobsen hava hesar viðmerkingar:

Á vári 1981 varð semja gjørd innan samgonguna um ymsar fløgur innan samferðluna. Henda semja fevndi m.a. um eina ætlaða loysn av helikoptaramálinum, millumlandasiglingini og gerð av sokallaðum primerum og sekunderum bergholum.

Avgjørt varð tá at seta av 5 mió. kr. um árið á teim komandi fíggjarløgtingslógunum í grunn til tey sokallaðu sekunderu bergholini (eitt nú bergholini til Trøllanes og Giásadals).

Avgjørt varð eisini at keypa amboð, egnað til gerð av dupultsporaðum bergholum og skjótast gjørligt at fara undir bergholið í gjøgnum Lorvíkarfjall.

Hesi nýggju amboð hava verið sera effektiv, so effektiv, at mett verður, at longu í næsta mánað er gjøgnumborað til Lorvíkar.

Fólkaflokkurin ásannar tað neyðuga og náttúrliga í at nýta hóskandi peningaupphæddir av fíggjarlógini til ávísar ábøtur á samferðslunetið, herundir, brýr og bergbol. Tað er ein samroynd frá bergholsgerðini í Kallsoynni, at ein við áhaldandi og samanhangandi at halda bergholsarbeiðið gangandi kann fáa fløgukostnaðin til bergholsgerðirnar munandi minkaðar fyri hvønn loypandi metur, og umvent, at ein við at gera steðg í arbeiðinum bert hækkar tann endaliga kostnaðin. Havandi í huga, at boritólini í Lorvíksfjalli skjótt gerast tøk og orsakað av, at bergholið Signabø/Kalbaksbotn enn ikki er projekterað og neyðug vegagerð báðu megin ikki er framd, gjørdi Fólkaflokkurin og tá serliga Páll Vang, landsstýrismaður, fdna roynd at fáa eina nýggja semju innan samgonguna, so farasl kundi undir begholsgerðina til Sumbiar, har neyðugar fyrireikingar eru framdar, nú í summar.

Tá samráðingarnar um nýggju semjuna av hinum báðum samgonguflokkunum harðliga vórðu gjørdar ómoguligar, legði Páll Vang uppskot fyri landsstýrið, sum, um tað varð samtykt, hevði loyvt honum at farið undir Sumbiar bergholið.

Men uppskotið varð feit av Samabndsflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum í landsstýrinum, og hava hesir báðir flokkarnir aftur enn eina ferð hótt við samgongusliti; hesat ferð um Fólkaflokkurin í løgtingimum tekur undir við bergholsgerð til Sumbiar. Sjálvsagt koyrir Fólkaflokkurin ikki landið út í eina stjórnarkreppu til tess at framskunda eina bergholsgerð nakrar mánaðir, Fólkaflokkurin hevur gjøgnum alt inniverandi valskeiðið vist á tað neyðuga í at varðveita tryggg politisk viðurskifti innan fiskivinnuna samfelagið. Fólka

flokkurin hevur ongantíð sett fram hóttanir um samgonguslit. Flokkurin hevur ferð eftir ferð átalað samgonguflokkarnar fyri hótt-flokkurin hevur ferð eftir ferð átalað samgonguflokkarnar fyri hóttanir teirra um samgonguslit og val í úrtíð, og flokkurin hevur ferð eftir ferð sagt frá, at hann so leingi tað er møguligt í valskeiðinum vil halda sman upp á verandi samgongu, tað fer Fólkaflokkurin eisini framhaldandi at gera. Løgmaður hevur boðað frá vali í september. Eftir valið fer Fólkaflokkurin at virka fyri eini skjótari loysn av fyrtiliggjandi máli, eins og flokkurin fer at mæala til eina projektering og fyrireiking av bergholinum Signabøur/Kalbaksbotnur, so farst kann undir tað bergholið, so skjótt komið er í gjøgnum til Sumbiar bergholið.

Flokkurin fer eisini at virka fyri, at byrjað verður upp á Gásadals bergholið, so skjótt komið er igjøgnum til Trøllanes við amboðunum, ið nýtt vera har.

Vísandi til frammanfyristandandi taka Svend Åge Ellefsen og Øssur Dam Jacobsen ikki undir við fyriliggjandi uppskoti og seta sum tilskilað omanfyri einki uppskot fram.

Minnilutin (Atli P. Dam, Ove Mikkelsen og Adolf Hansen) mælir til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Atli Dam) leggur afturat:

Sagt verður, at pappfrið er tolið, og liggur í hesum, at hetta óseka pappír uttan eymkan tekur ímóti sjálvt tí mest óttúliga.

Oyðslið av virðisleysum orðum frá umboðum fólkafloksins og papírsspillið sum hesi umboð gera seg sek í í fyriliggjandi máli, ber tó av.

Í longu sjóforkláringini liggur ikki bert ein vanvirðan av tingmonnum, sum skulu leggja eygu og oyru til, at verunleikin verður so tóvdur upp í tóva, men eisini ein undirmeting av hugsunnarevnum veljaranna, sum skulu slúka hesa umbering fyri, at fólkaflokkurin — sær sjálvur líkur — eina ferð enn rennur frá teim lyftum, hann gevur.

Í samgonguni 1975-80 gekk fólkaflokkurin frá givnum skrivaðum orði. Hetta orsakaði sum kunnugt samgonguslit, og høvdu fólkafloksmenn harvið ábygdina av, at bergholsgerðin Lopra/Sumba ikki byrjaði í 1981, soleiðis sum útbyggingarætlanin tá segði.

Vit hava frætt frá samgongumonnum fólkafloksins, at heldur ikki í hesi borgarligu samgongu kunnu orð hansara takast fyri fult, tí flokkurin er ikki til at líta á.

Tað er tí ógvuliga soltið og virðislítið, at fólkaflokkurin nú sigur, at eftir valið í heyst skal flokkurin halda tey lyfti, hann í hesi

samgongu hevur givið um bergholsgerð Lopra/Sumba (Páll Vang: »Eingin undanførsla verður góðtikin«).

Tingmenn kundu helst skilt, at tað er ilt hjá fólkaflokkinum at seta seg í ta støðu, at hann enn einaferð hevur ábyrgdina av einum samgongusliti, men tá væntaðu teir eisini, at flokkurin av sømiligheitsgrundum gekk spakuliga um hurðarnar og tagdi. Men ístaðin speirekur fólkaflokkurin tey hesum máli avvarðandi við lyftum, sum hann á ongan hátt kann geva innihald, tí trygdin fyri, at nakar vil geva hesum flokki medávirkan á gongdina í hesum samfelag eitt komandi valskeið er eingin — als eingin.

Skal ein kunna takast fyri fult í politikki, mugu menn kunna líta á, at álvari er í, og at givin orð halda, tí kemur fólkaflokkurin helst í somu støðu, sum hann nú hevur sett hesa samgongu í:

»Bert at ana politiskt.«

2. viðgerð 27. apríl. Atkvøðugreiðsla 4. mai. Uppskot Javnaðarfloksins fall við 13 ja-atkvøðum, 18 atkvøddu ikki, 1 var burturstaddur. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

| | |
|---|---|
| Ja atkvøddu: | Adolf Hansen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Ingrid Sondum, Hans J. Debes, Petur Reinert, H. M. Joensen. |
| Atkvøddu ikki: | Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Finnbogi Isaksen, Arne Ziskasen, Poul Michelsen, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Edmund í Garði, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein. |
| Burturstaddur: | Juul Jacobsen. |

F.L.j.nr. 1817-50.

# 82. Veðhald fyri láni til og partapening í P/f Blue North, Kollafirði.

Ár 1984, fríggjadagin 16. mars legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um veðhald fyri láni til, og partapening í P/f Blue North, Kollafirði.**

**§ 1.** Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veita veðhald fyri upp til 2.800.000 kr. í láni til P/f Blue North, Kollafirði.
*2. stk.* Lánið skal verða tryggjað við panti í fastogn innanfyri 70% av tí virði, fastognin hevur.

**§ 2.** Landsstýrinum verður samstundis heimilað at seta 20% av partapeningi í P/f Blue North, Kollafirði.

**§ 3.** Henda løgtingslóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om garanti for lån til, og aktiekapital i P/f Blue North, Kollafirði.**

**§ 1.** Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at yde garanti for lån op til 2.800.000 kr. til P/f Blue North, Kollafjørð.
*Stk. 2.* Lånet skal være sikret med pant i fast ejendom inden for 70% af den værdi, den faste ejendom har.

**§ 2.** Landssstyret bemyndiges samtidig til at sætte 20% af aktiekapitalen som aktiekapital i P/f Blue North, Kollafjørð.

**§ 3.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Ætlanin er at fara undir »crab-stick« framleiðslu í Kollafirði. Tað er P/f Bue North, sum stendur aftanfyri.

»Crab-stick« er ein sonevnd liðugvøra, gjørd úr surimi, ið sum kunnugt er víðari góðskað fars.

Surimiið skal eftir ætlanini framleiðast umborð á M/S Reynatindi.

»Crab-stick« verður gjørt úr hesum evnum:

| | | |
|---|---|---|
| Surimi | ca. | 50% |
| Vatn | ca. | 30% |
| Eggjahvíti, stívilsi og salt | ca. | 14% |
| Krabbackstrakt, kryddarurtir v.m. | ca. | 6% |
| | | 100% |

Seinast nevndu tilseticvnir verða í fyrsta umfari at innflyta úr Japan.

Tann heldur stóra nøgdin av vatni hevur sína høvuðsorsøk í, at surimiið í sjálvum sær er ein »avvatnað« farsvøra, og tá »crab-stick« skal líkjast verunligum krabbakjøti mest møguligt, má vatninnihaldið í hesi vøru sjálvandi vera hitt sama, sum í veruligum krabbakjøti.

»Crab-stick« er ein »nýggj« vøra á sama hátt sum »fish-fingers« var tað fyri o.u. 20-25 árum síðani. Vøran varð fyrstu ferð flutt úr Japan til vesturheimin í 79-80. Yvirhøvur hevur útflutningurin síðani tá verið tvífaldaður á hvørjum ári.

Í 1982 var japanski útflutningurin av »crab-stick«:

| | |
|---|---|
| Usa | 6.700 tons |
| Australia | 1.750 tons |
| EEC-londini | 550 tons |
| Onnur lond | 330 tons |

Umleið helmingurin av útflutninginum til EEC-londini í 1982 fór til Onglands.

Í 1983 fer so fram ein stórur vøkstur av søluni — serstakliga í Stóra Bretlandi, men yvirhøvur eisini um allan heimin.

Tølini niðanfyri eru úr »The Urkins Seafood Letter« 30. december 1983 og sýna søluna av »crab-stick« í tíðarskeiðinum januar-september 1983 í mun til søluna januar-september 1982.

| Land: | Søla jan.-sept. 1981 | Søla jan.-sept. 1982 | Vøkstur faldan |
|---|---|---|---|
| USA eystur | 2.372 | 905 | 2,6 |
| USA vestur | 6.081 | 2.134 | 2,9 |
| New Zeland | 222 | 49 | 4,6 |
| Australia | 1.170 | 635 | 1,8 |
| Stóra Bretland | 1.650 | 164 | 10,1 |
| Belgien | 106 | 28 | 3,3 |
| Holland | 172 | 53 | 3,2 |
| Suður Afrika | 86 | 26 | 3,3 |
| Onnur lond | 218 | 96 | 2,3 |
| Tilsamans | 12.077 | 4.090 | 2,9 |

Vit síggja her, at bara í Bretlandi er vøksturin 10-faldaður eftir einum ári.

Gjørd er ein rímulig »prognosa« fyri tey komandi 5 árini og vísir hon eina tíggjufaldan av søluni í USA.

Føroya Fiskasøla hevur ta seinastu tíðina marknaðarført japanskan »crab-stick« (umpakkaður í Hirtshals) í Onglandi. Eftir tí, ið skilst, er Føroya Fiskasøla yvirhøvur nøgd við úrslitið higartil.

Prisurin á »crab-stick« er umleið 60 kr./kg. leverað til heilsølu í Onglandi, og líkt er til, at vit kunnu fáa sama prís í USA.

Tað skuldi ikki verið nakar trupulleiki at fingið rávøru, nú Reynsatindur verður klárur at levera surimi komandi vetur.

Annars hevur Nissui, Tokio, yvir fyri Blue North pr. telex váttað, at um virkinum fer at tørva surimi í byrjanini, kunnu teir levera hesa rávøru fyri umleið *d. kr. 21,- pr. kg.*, cif danska havn — t.v.s. fyri umleið sama prís leverað Kollafjørð, sum roknað er við at surimiið skal kosta frá Reynsatindi (kr. 24,- pr. kg.).

Verksmiðjan er metl til at kosta 16.800.000 kr. Fíggingin ætlast fingin til vega á henda hátt:

Lán við panti í virkinum:

| | | |
|---|---|---|
| 1. prioritet Kreditforeningen Danmark | kr. | 3.300.000,- |
| 2. prioritet Føroya Idnaðargrunnur | - | 4.000.000,- |
| 3. prioritet lán við landskassaveðhaldi | - | 2.800.000,- |
| 4. prioritet Menningargrunnurin | - | 1.000.000,- |
| 5. prioritet lán aðrastaðni | - | 1.300.000,- |
| Tilsamans | kr. | 12.400.000,- |

| | | |
|---|---|---|
| Stuðul: | | |
| Grunnurin til ídnaðarfremjandi endamál | kr. | 1.650.000,- |
| Menningargrunnurin | - | 450.000,- |
| Tilsamans | kr. | 2.100.000,- |

| | | |
|---|---|---|
| Eginpeningur: | | |
| Partapeningur, almennur | kr. | 460.000,- |
| Partapeningur, privatur | - | 1.840.000,- |
| Tilsamans | kr. | 2.300.000,- |

1. viðgerð 21. mars. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 3. apríl legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 16. mars 1984 og undir 1. viðgerð tann 21. mars beint í fíggjarnevndina.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Jørgen Thomsen, Ove Mikkelsen og Juul Jacobsen gera tó vart við, at tað má verða sjálvsagt, at landsstýrið fær nevndarlim í felagnum.

2. viðgerð 6. apríl 1984. §§ 1 og 2 vórðu samtykt við 26-0, § 3 uttan atkvøðugreiðslu. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 26-0 atkvøðum.

3. viðgerð 10. apríl 1984. Málið endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1427-1-207. Lóg nr. 38 frá 3. mai 1984.

# 83. Grannskoðan av almennum roknskapum.

**1. Sjúkrahúsverk Føroya.**

Ár 1984, fríggjadagin 16. mars løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyri nevndu roknskapir hjá Sjúkrahúsverk Føroya fyri fíggjarárini 1981/82 og 1982/83 saman við viðmerkingunum frá løgtingsgrannskoðarunum.

**Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum.**

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar og roknskapargrannskoðarans frágreiðingar hjá Landssjúkrahúsinum, Klaksvíkar- og Suðuroyar sjúkrahúsi fyri omanfyri nevndu fíggjarár og fingið trygd fyri, at peningavirðið og skjalatilfarið hjá sjúkrahúsunum eru kannað.

Í fyruu álitum okkara til Føroya Løgting viðvíkjandi Sjúkrahúsverki Føroya hava løgtingsgrannskoðarnir gjørt vart við, at eykafíggjarlógin hjá sjúkrahúsunum, sum vanliga verður løgd fram rættiliga tíðliga í hvørjum fíggjaráti sær, ikki hevur verið løgd fyri Fíggjarnevnd Løgtingsins til góðkenningar ella játtanar.

Fyri roknskaparárið 1982/83 eru løgtingsgrannskoðarnir varugir við, at eykafíggjarlógin ikki er við í roknskapinum hjá sjúkrahúsunum.

Um hesi viðurskiftini hava løgtingsgrannskoðarnir gjørt

kanningar og fyrispurningar hjá sjúkrahússtjóranum og umsjónarmonnunum fyri sjúkrahúsunum sum siga:

Fíggjarlógaruppskotið varð gjørt fyri 1982/83, men fekk leiðslan á sjúkrahúsunum boð um, at sjúkrahúsini skuldu halda seg innan fyri ta givnu játtanina í sjálvari fíggjarløgtingslógini, og varð tað sostatt ikki neyðugt við eini eykafíggjarlóg í sjálvum fíggjarárinum.

Hóast nevndu boð frá landsstýrinum hava øll sjúkrahúsini yvirnýtslu.

| | |
|---|---|
| Landssjúkrahúsið | 4,4 mill. kr. |
| Suðuroyar sjúkrahús | 0,7 mill. kr. |
| Klaksvíkar sjúkrahús | 1,9 mill. kr. |

Løgtingsgrannskoðararnir eru av teirri áskoðan, at um Sjúkrahúsverk Føroya metir tað neyðugt við eini eykafíggjarlóg í sjálvum fíggjarárinum, so má eigur hetta at verða gjørt, og skulu løgtingsgrannskoðaraarnir mæla løgtinginum til at álagt verður landsstýrinum, at hetta verður fingið í rætt lag aftur beinanvegin tó soleiðis, at tað er Fíggjarnevnd Løgtingsins, sum í sama fíggjarárinum tekur støðu til møguligar eykaútreiðslur ella meirjáttan, og ikki eitt løgting mánaðir aftaná at eitt fíggjarár er farið aftur um bak á eini eykafíggjarlóg.

Hetta eigur eisini at verða galdandi fyri allar almennar stovnar.

Havast má í huga, at eitt fíggjarlógaruppskot neyðturviliga verður gjørt eftir metan, og at tað ikki altíð er lætt at meta um peningatørvin meir enn eitt ár fram í tíðina.

Í fyrra álitið okkara viðvíkjandi sjúkrahúsverkinum hava løgtingsgrannskoðarnir gjørt vart við, at innleggingarprosentið á Suðuroyar sjúkrahúsi er lágt, og at raksturin pr. sjúkradag av hesi orsøk er dýrur.

Um hesi viðurskifti hava løgtingsgrannskoðarnir eisini gjørt kanningar við fyrispurningi hjá umsjónarmanninum á Suðuroyar sjúkrahúsi, og frá honum fingið váttan fyri, at hetta mál er viðgjørt á stýrisfundi.

Við kanningum av tekningum av sjúkrahúsinum kom fram, at sjúkrahúsið er bygt til 20 seingjarpláss, og ikki 26 sum framgongur av roknskapinum.

Eftir hesum varð viðtikið á fundi tann 26. okt. 1983 at seta seingjarplássini til 20 frá fíggjarárinum 1983/84 at rokna. Við 20 seingjarplássum vildi belegningsprosentið fyri til dømis 1982/83 komið uppá 98,9, og ikki sum í frágreiðingini fyri sjúkrahúsið stendur at verða 76,09.

Løgtingsgrannskoðarnir taka hesa broyting til eftirtektar.

Løgtingsgrannskoðarnir hava áður gjørt vart við, at bygningar v. m. hjá Klaksvíkar sjúkrahúsi hava verið ov lágt tryggjaðir. Løgtingsgrannskoðararnir hava nú ásamnað, at hesar nú eru hækkaðar, og at bygningar v.m. nú mugu metast at verða rætt tryggjaðir.

Løgtingsgrannskoðarnir átala annars, at nýtslan hjá øllum sjúkrahúsunum er ov stór, og at neyvari má verða mett, tá tá fíggjarlógaruppskotini verða gjørd.

Annars verða frammanfyri nevndu roknskapir hjá Sjúkrahúsverki Føroya tiknir til eftirtektar.

2. viðgerð 20. mars. Uppskotið til samtyktar var samtykt við 30-0 atkvøðum.

---

# 83. Grannskoðan av almennum roknskapum.

**2. Útvarp Føroya.**

Ár 1984, fríggjadagin 16. mars løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

Løgtingstíðindi 1983 A 5K

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyri nevndu roknskapir hjá Útvarp Føroya fyri fíggjarárini 1981/82 og 1982/83 saman við viðfylgjandi viðmerkingum.

**Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum.**

Løgtingsgrannskoðararnir hava grannskoðað roknskapirnar hjá Útvarp Føroya fyri omanfyri nevndu ár og ásannað at roknskapargrannskoðanin av stovninum er farin fram samsvarandi reglunum. Endaligur byggiroknskapur fyri nýggja Útvarpshúsið, sum er gjørdur í aug. 1982, er líkaleiðis kannaður av løgtingsgrannskoðarunum.

Byggiroknskapurin vísir ein endaligan byggikostnað uppá ca. 33,7 mill. kr.

Løgtingsgrannskoðararnir eru varugir við, at Útvarpið í 1977 eftir áheitan frá Føroya landsstýri legði kr. 228.400,00 út í samband við fyrireikan av millumbylgjusendara. Peningurin er afturgoldin í 1981/82, men uttan endurgjald fyri rentutap, ið varð roknað til kr. 117.300,40.

Løgtingsgrannskoðarnir eru av teirri áskoðan, at Útvarpið eigur at fáa hetta rentutap endurgoldið.

Millumrokning Útvarpsins við Telefonverk Føroya Løgtings vísir ein mun uppá kr. 72.364,00. Hesin munur stavar frá eini rokning frá 1975, sum avtala var um, at F. landsstýri skuldi gjalda. Heitt verður á avvarðandi almennu stovnar um beinan vegin at fáa greiðu á hesum máli.

Viðvíkjandi fíggjarstøðu Útvarpsins skulu løgtingsgrannskoðarnir, eins og gjørt varð í seinasta áliti okkara viðvíkjandi hesum stovni, aftur nú gera vart við, at við núverandi inntøkum kemur nógv at resta í hjá Útvarpinum at klára at gjalda fíggjarútreiðslurnar av nýggju Útvarðshúsunum.

Fyri at kunna sleppa úr núverandi ótryggu støðu heita løgtingsgrannskoðararnir á Føroya Løgting um at álagt verður landsstýrinum, at á komandi fíggjarløgtingslógum, hagartil lánini av húsunum eru goldin, verður avsettur ein postur, sum nøkulunda svarar til rentur og avdráttir av nýggju Útvarpshúsunum.

Samsvarandi fíggjarætlanina hjá Útvarpinum fyri 1984/85 verða hesar útreiðslur ca. 5.4 mill. kr.

2. viðgerð 20. mars. Uppskotið til samtyktar varð samtykt við 27-1 atkvøðum.

---

# 83. Grannskoðan av almennum roknskapum.

**3. Tjaldurs Apotekið.**

Ár 1984, fríggjadagin 16. mars løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyri nevnda roknskap hjá Tjaldurs Apoteki fyri fíggjarárið 1982/83 saman við nevndu viðmerkingum frá løgtingsgrannskoðarunum.

**Viðmerkingarnar frá løgtingsgrannskoðarunum.**

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapin hjá Tjaldurs Apoteki fyri fíggjarárið 1982/83 og fingið trygd fyri, at peningaviðurskiftini og skjalatilfarið hjá apotekinum eru kannað, og at roknskapargrannskoðarin hevur fingið vissu fyri, at fíggjarliga støða apoteksins er í lagi.

Eisini hava løgtingsgrannskoðararnir móttikið og lisið frá-

greiðing landsapotekarans dagfest 24. okt. 1983, til roknskapin hjá apotekinum fyri 1982/83.

Ásannandi at likviditetur apoteksins er tað batnaður, og nú raksturin vísir positivt úrslit, taka løgtingsgrannskoðarnir undir við roknskapargrannskoðarans og landsapotekarans viðmerkingum um, at útlegg landskassans fyri byggilán, sum pr. 31/3-1983 vísti ca. 2 mill. kr., eigur at verða afturgoldið landskassanum skjótast til ber.

2. viðgerð 20. mars. Uppskotið til samtyktar varð samtykt við 29-0 atkvøðum.

---

# 83. Grannskoðan av almennum roknskapum.

**4. M/T »Nónhamar«.**

Ár 1984, fríggjadagin 16. mars løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyri nevnda roknskap hjá M/T »Nónhamar« fyri árið 1982 — saman við frágreiðing løgtingsgrannskoðaranna.

**Frágreiðing løgtingsgrannskoðaranna.**
Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapin og frágreiðing roknskapargrannskoðarans hjá M/T Nónhamri

fyri omanfyri nevnda ár og fingið trygd fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfarið eru kannað, og at roknskapargrannskoðarin hevur fingið røttu mynd av rakstri og fíggjarstøðu skipsins við árslok 1982.

Landskassin yvirtók trolaran í 1980, og síðan hevur hann verið rikin og umsitin av P/f J.F. Kjølbro.

Samlaða skuldin hjá M/T Nónhamri í landskassanum var pr. 31. des. 1982 ca. 27 mill. kr.

Bókaða skipsvirðið í landskassanum pr. 31. dec. 1982 var ca. 20 mill. kr.

Roknskapurin fyri omanfyri nevnda ár verður tikin til eftirtektar.

2. viðgerð 20. mars. Uppskotið til samtyktar varð samtykt við 29-0 atkvøðum.

---

# 83. Grannskoðan av almennum roknskapum.

**5. Føroya Yvirformyndari.**

Ár 1984, fríggjadagin 16. mars løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyri nevnda roknskap hjá Føroya Yvirformyndarí fyri 1981/82 saman við frágreiðing løgtingsgrannskoðaranna.

**Frágreiðing løgtingsgrannskoðaranna.**
Løgtingsgrannskoðararnir hava kannað ársroknskapin hjá Føroya Yvirformyndari fyri fíggjarárið 1981/82, og hava ásannað at formyndaríið røkir sínar roknskaparligu skyldur samsvarandi lógini.

2. viðgerð 20. mars. Uppskotið til samtyktar varð samtykt við 29-0 atkvøðum.

---

# 84. Bústaðarviðurskifti hjá evnaveikum.

Ár 1984, fríggjadagin 16. mars legði sosiala nevndin fram soljóðandi

**Álit**

Løgtingið hevur frá felagnum Javna fingið skriv dagfest 23. februar 1984 um, at einki stovnspláss er tøkt longur til evnaveik í Føroyum. Brævið varð beint í sosialu nevnd til viðgerðar.

Nevndin hevur hin 15. mars 1984 havt fund við Eilif Samuelsen, landsstýrismann í sosialum málum, og skal hervið geva Løgtinginum hesa frágreiðing um fundin og tað, sum landsstýrismaðurin bar fram.

Eilif Samuelsen greiddi frá, at hann hevði havt fund við leiðaran á Eirargarði 14-16 um støðuna. Hann segði, at ætlanin er at leiga eini hús við um leið 6 plássum sum ískoyti til Eirargarð. Landsstýrið fer beinanvegin í gongd við at leita eftir húsum og fer at skriva til sosialstýrið um tær neyðugu játtanirnar til endamálið.

Landsstýrið vil fáa hesa skipan í lag beianvegin og leggja peningin út fyri útreiðshurnar, hagartil játtanim frá donsku myndugleikunum fyriliggur.

Landsstýrismaðurin lovaði at gera alt, hann var mentur fyri at hindra, at neyðugt varð, at nakar evnaveikur vegna plásstrot var noyddur at flyta av landinum.

Sum støðan er í løtuni, metir sosiala nevndin, at hetta kann loysa tann akutta tørvin hjá andveikranevndini. Nevndin vil fylgja málinum upp.

2. viðgerð 20. mars. Málið varð tikið til eftirtektar og avgreitt.

---

# 85. Lóg um kommunalan útjavningargrunn.

Ár 1984, týsdagin 20. mars legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt at seta nevnd við umboðum fyri kommununar og landsmyndugleikarnar at gera uppskot til løgtingslóg um kommunalan útjavningargrunn.

**Viðmerkingar:**
Eftir nógvum árum er fíggjarliga býtið millum kommununar og landskassan broytt, soleiðis at landskassans inntøkur eru øktar meira enn inntøkurnar hjá kommununum, samstundis sum krøvini til kommununar eru vorðin munandi størri.

Í kommunubókini, sum varð útgivin av Føroya Kommunufelag í 1978, verður millum annað sagt um hesi viðurskifti, at í 1956/57 vóru samlaðu almennu inntøkurnar 27 mió. kr. Hetta tal umfatar allan skatt, toll og øll gjøld til tað almenna. Av hesum 27 mió. kr. fóru 9 mió. kr. í kommunukassarnar, meðan 18 mió. kr. fóru í landskassan. Hetta vil siga, at fyri hvørja ferð kommununar fingu 1 kr., fekk landskassin 2 kr.

20 ár seinni ella í 1976/77 er støðan sambært kommunubókina tann, at samlaðu almennu inntøkurnar eru 483 mió. kr. Av hesum fóru 117 mió. kr. í kommunukassarnar og 366 mió. kr. í landskassan. Sostatt fekk landskassin tá 3,13 kr. fyri hvørja ferð kommununar fingu 1 kr.

Taka vit so fíggjarárið 1982/83 sær myndin soleiðis út: Samlaðu almennu inntøkurnar vóru 1 mia. 429 mió. 605 tús. kr. Av hesum fóru 1 mia. 113 mió. 615 tús. kr. í landskassan. Inntøkurnar hjá kommunum vóru slakar 316 mió. kr. Nú fær landskassin 3,53 kr. fyri hvørja ferð kommununar fáa 1 kr.

Sambært ársfrágreiðingina fyri 1982 er inntøkugrundartagið hjá teimum ymisku kommununum eisini rættiliga ymist. Í tí kommununi, sum liggur hægst, er meðalinntøkan kr. 82.914,00. Í tí kommuni, sum liggur lægst, er meðalinntøkan kr. 34.150,00. Kommunan við tí hægstu skattainntøkuni pr. skattgjaldara hevur eitt skattaprosent upp á 15,65. Kommunan við tí lægstu skattainntøkuni pr. skattagjaldara hevur eitt skattaprosent upp á 15,0.

Dømini, sum her eru nevnd, tala fyri, at ein útjavning eigur at fara fram millum landskassan øðrumegin og kommununar hinumegin, og at hendan útjavning eigur at koma teimum fíggjarliga veiku kommunum til góðar. Javnaðarflokkurin heldur, at hetta kann loysast við einum kommunalum útjavningargrunni, sum landskassin á hvørjum ári setir eina ávísa upphædd í, og sum síðani eftir ávísum reglum letur fíggjarligan stuðul til kommunur við avmarkaðum inntøkugrundarlagi.

Seinastu árini er nógv tosað og skrivað um bygdamenning. Tað má ásannast, at ymist er gjørt í royndini at menna bygdirnar. Tí hava nógvar bygdir fingið tíðarhóskandi vegasamband. Ein vælvirk-

andi strandferðsla sjó-, land- og loftvegis hevur eisini stóran týdning. Í nógv ár hevur landskassin verið til reiðar art seta upp til 20% í partapeningi í arbeiðsskapandi tiltøk kring landið. Eisini lata bæði landskassin og rikiskassin stuðul til ávísar uppgávur.

Men hetta tykist kortini ikki at vera nóg mikið. Javnaðarflokkurin heldur, at megintreytin fyri, at bygdirnar kunnu mennast, er, at tær kommunalu eindirnar gerast fíggjarliga sterkar og harvið førar fyri at skapa fortreytir fyri arbeiðsskapandi tiltøkum og fortreytir fyri trivnað og liviligum korum úti á bygdunum.

Javnaðarflokkurin mælir til, at løgtingið longu á komandi fíggjarlóg setir 20 mió. kr. av til kommunalar útjavningargrunnar og at landsstýrið fær álagt at seta nevnd við umboðum fyri kommunurnar og landsmyndugleikarnar at gera uppskot til kommunalan útjavningargrunn. Flokkurin heldur eisini, at ein kommunalur útjavningargrunnur eigur at verða umsitin av Føroya Kommunufelag.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 27. apríl 1984 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av Javnaðarflokkinum tann 20. mars 1984 og undir 1. viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og er undir viðgerðini útvegað uppskot frá Føroya Kommunufelag (FKF) dagfest 25. mars 1982 um kommunalan lánsgrunn og kommunalan útjavningargrunn. Eisini tað talt tilfar, ið tá var sett upp til at lýsa uppskotið.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í tríggjar minnilutar.

Minnilutin (Atli P. Dam, Ove Mikkelsen og Asbjørn Joensen) tekur undir við uppskoti Javnaðarfloksins.

Ein annar minniluti (Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen og Øssur Dam Jacobsen) tekur støðu í tingsalinum.

Ein triði minnilutin (Adolf V. Hansen) setir fram soljóðandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið setir millumtinganevnd við einum umboði úr hvørjum flokki at viðgera hugskot dagfest 25. mars 1982 Føroya Kommunufelags um kommunalan útjavningargrunn.

2. viðgerð 1. mai. Upprunauppskotið fall við 15-0 atkvøðum, uppskotið frá Adolf V. Hansen fall við 5-0 atkvøðum.

---

# 86. Lóg um skipatrygd v.m.

Ár 1984, týsdagin 20. mars legði Páll Vang, landsstýrismaður, fyri Anfinn Kallsberg, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 98 frá 12. mars 1980 »om skibes sikkerhed m.v.« verður sett í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan, sbr. § 29, stk. 4, í lógini.

**Viðmerkingar:**

Tann 1. juli 1980 kom lóg nr. 98 frá 12. mars 1980 »om skibes sikkerhed m.v.« í gildi í Danmark og avloysti lóg nr. 117 frá 28. mars 1951 um eftirlit við skipum, sum framvegis er galdandi í Føroyum.

Nýggja lógin kann við kgl. fyriskipan við neyðugum broytingum vegna føroysk viðurskifti setast í gildi her.

Lóg um skipatryggleika er ein nútíðargerð av lógareglunum í mun til gomlu lógina, soleiðis at gjørligt er at gera eina meiri smidligan og lættan háttan at laga reglurnar eftir tekniska framburðinum, ið ger eina leypandi revisión neyðuga í mun til internationalar konventiónir.

Lógin verður ti bygd upp sum ein rammulóg við heimild til ráðharran at fyriseta stakfyriskipanir. Sum dømi um hetta kann nevnast kunngerð nr. 351 frá 26. juni 1981 um sýn og certifikatir.

Skipasýnið hevur í kunngerð nr. 362 frá 5. august 1980 fingið heimild at áseta tekniskar forskriftir við bygging av skipum. Tílíkar forskriftir verða ikki kunngjørdar í Lovtidende, men í »Skibstilsynets meddelelser«.

Lógin um skipatrygd er ein fortreyt fyri at kunna góðkenna ymsar alheimssáttmálar, t.d. SOLAR 1974/78 um bygging og útgerð, MARPOL 73/78 um fyribyrging fyri dálking frá skipum og neyðug certificatir á hesum øki er bert heimild at skriva eftir nýggju lógini.

Tær kunngerðir, sum framvegis eru galdandi í Føroyum við heimild í gomlu lógini, eru partvis avoldaðar. Munurin millum rættarreglurnar í Føroyum og hinum partinum av ríkinum verður tí størri og størri, longri tíðin gongur, áðrenn nýggja lógin verður sett í gildi í Føroyum. Trupulleikarnir við at yvirflyta nýggju reglurnar eru eisini alsamt vaksandi. Haraftrat er tað trupult hjá skipasýninum at umsita ymsar reglur á sama øki.

Tað er tí ynskiligt, at lógin um skipatrygd v.m. og reglurnar við heimild í hesi lóg verða settar í gildi í Føroyum skjótast gjørligt.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint í lóganevndina, sum 29. mars legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð framlagt av landsstýrinum 20. mars 1984 og við 1. viðgerð 23. í s.m. beint í lóganevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Asbjørn Joensen, Arne Ziskasen, Jákup Lindenskov og Agnar Nielsen) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

Minnilutin (Petur Reinert) setir fram fylgjandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at yvirtaka skipasýnið og gera neyðugar reglur um skipatrygd.

2. viðgerð 30. mars 1984. Málið varð samtykt við 25-0. Uppskotið til samtyktar frá Peturi Reinert fall við 7-0.

F.L.J.nr. 628-1.

---

# 87. Veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir.

Ár 1984, týsdagin 20. mars legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**

**løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir.**

**§ 1.** Landsstýrinum verður heimilað saman við fíggjarnevndini landskassans vegna í fíggjarárinum 1984/85 at veðhalda fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir, sum eru komin í fíggjarliga trong-

**garanti for lån til fiskerskibe og fiskerivirksomheder.**

**§ 1.** Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget på landskassens vegne i finansåret 1984/85 at garantere for lån til fiskerskibe og fiskerivirksomheder, der er kommet i drifts-

stoðu. Hin samlaða veðhaldsupphæddin má ikki fara upp um 25 mió. kr.

§ 2. Treytirnar, fyri at veðhald kann verða veitt, eru hesar:

I At líkindi eru til, at rakstrurin framvvið eftir øllum fyriliggjandi upplýsingum fer at bera sig.

II a) Har talan er um fiskavirkir, *at* eginpeningurin verður hækkaður við í minsta lagi 10% av tí peningi, ið veitt verður sambært hesi lóg. *At* fingin verða onnur veðhald fyri í minsta lagi 15% av tí peningi, ið neyðugur er til framhald av rakstrinum, ella fingin verða onnur lán, sum ikki krevjast afturgoldin vvir stytri áramál enn áramálið fyri tey lán, landið veðheldur fyri sambært hesi lóg.

*2. stk.* Landsstýrinum er í serligum førum, har talan er um fiskavirki á smáplássi, heimilað at víkja frá reglum um kravið um 15%, sum nevnt er í 1. stk.

II b) Har talan er um fiskiskip, har partafelag er ognari, *at* eginpeningurin verður hækkaður við í minsta lagi 10% av tí veðhaldsupphæddd, ið veitt verður sambært hesi lóg.

vanskeligheder. De samlede garantibeløb må ikke overstige 25 mio. kr.

§ 2. Betingelserne, for at garanti ydes, er disse:

I At der er udsigt til, at driften fremover efter alle foreliggende oplysninger bliver rentabel.

II a) Hvor det drejer sig om fiskerivirksomheder, *at* egenkapitalen forhøjes med mindst 10% af det beløb, der ydes i henhold til denne lov. *At* andre garantier tilvejebringes for mindst 15% af det beløb, der er nødvendigt til fortsættelse af driften, eller der opnås andre lån, der ikke må forlanges tilbagebetalt over kortere åremål end åremålet for de lån, for hvilke landet garanterer i henhold til denne lov.

*Stk. 2.* Hvor der er tale om fiskerivirksomhed på småpladser bemyndiges landsstyret til under særlige omstændigheder at fravige reglen om 15%, som er nævnt i stk. 1.

II b) Hvor talen er om fiskerskibe, der tilhører aktieselskab, *at* egenkapitalen forhøjes med mindst 10% af det garantibeløb, der ydes i henhold til denne lov.

IIc Har talan er um fiskiskip, har einstaklingur, partsreiðarar ella líknandi eru ognarar, *at* inngoldið er í minsta lagi út yvir kravda eginpeningin spardur skattur, sum stavar frá avskriving upp á skipið skattaárini 1982/83, 1983/84 og 1984/85 og *at* nýinngoldin verða 10% av tí veðhaldsupphædd, ið veitt verður sambært hesi lóg.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

IIc) Hvor der er tale om fiskerskibe, hvor enkeltpersoner, partsredere eller lignende er ejere, *at* der er indbetalt mindst ud over den udkrævede egenkapital sparet skat, som stammer fra afskrivning på skibet skatteårene 1982/83, 1983/84 og 1984/85, og *at* nyindbetalt bliver 10% af det garantibeløb, der ydes i henhold til denne lov.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Sambært løgtingslóg nr. 66 frá 30. juni 1983 um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir (kreppulán), tingmál nr. 107/1982, er henda lóg galdandi fyri fíggjarárið 1983/84.

Sambært hesi lóg eru tilsagnir givnar fyri veðhald av umleið kr. 13,5 mió.

Í mun til lóg nr. 66 er bert ein broyting í § 2, IIc, har »nýinngoldin verða 10% av tí peningi, ið neyðugur er til framhald av rakstrinum« verður broytt til »nýinngoldin verða 10% av tí veðhaldsupphædd, ið veitt verður sambært hesi lóg«, so hetta samsvarar § 2, IIa og IIb.

1. viðgerð 26. mars. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 29. mars legði fram soljóðandi:

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 20 mars 1984 og undir 1. viðgerð tann 26. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Svend Age Ellefsen, Øssur Dam

Jacobsen og Hilmar Kass) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Atli P. Dam) kann ikki taka undir við uppskotinum og vísir til prinsipiellu støðu Javnaðarfloksins sum lýsta í uppskoti floksins til skilabótalán og vísir eisini til næsta uppskot frá landsstýrinum, sum løgmaður á fundi í fíggjarnevndini hevur fráboðað, skal koma viðvíkjandi fíggjarviðurskiftum hjá fiskiskipum og flakavirkjum, sum eru í kreppustøðu.

Minnilutin (Ove Mikkelsen og Adolf V. Hansen) er av teirri áskoðan, at lógin eisini skal fevna um smolt- og alistøðir, og setir fram soljóðandi

**broytingaruppskot**

til uppskot landsstýrisins:

§ 1, 1. punktum verður orðað soleiðis:

»Landsstýrinum verður heimilað saman við fíggjarnevndini landskassans vegna í fíggjarárinum 1984/85 at veðhalda fyri lánum til fiskiskip, fiskavirkir og smolt- og alibrúk, sum eru komin í fíggjarliga trongstøðu.«

Sum § 2, II, d) verður sett:

»Har talan er um smolt- og alibrúk, at eginpeningur verður hækkaður við í minsta lagi 10% av tí peningi, ið veittur verður sambært hesi lóg, at fingin verða onnur lán fyri í minsta lagi 15% av tí peningi, ið neyðugur er til framhald av rakstrinum, ella fingin vera onnur lán, sum ikki krevjast afturgoldin yvir stytri áramál enn áramálið fyri tey lán, landið veðheldur fyri sambært hesi lóg.«

§ 1, 1. punktum formuleres som følger:

»Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget på landskassens vegne i finansåret 1984/85 at garantere for lån til fiskeskibe, fiskerivirksomheder og smolt- og fiskeopdrætsanlæg, som er kommet i driftsvanskeligheder.«

Som § 2, II, d) indsættes:

»Hvor det drejer sig om smolt- og fiskeopdrætningsanlæg at egenkapitalen forhøjes med mindst 10% af det beløb, som ydes i henhold til denne lov, at andre garantier tilvejebringes for mindst 15% af det beløb, der er nødvendigt til fortsættelse af driften, eller der opnås andre lån, som der ikke må forlanges tilbagebetalt over kortere åremål end åremålet for de lån, for hvilke lan det garanterer i henhold til denne lov.«

Minnilutin (Adolf V. Hansen) mælir til, at lóggávan í torvandi máti leggur dent á tann geografska táttin í ti einkulta málinum sær og setir fram soljóðandi

**broytingaruppskot**

til uppskot landsstýrisins:

Sum nýtt § 2, II, a) 3. stk. verður sett:

»Landsstýrið hevur í huga teir fyrimunir og teir vansar, hvørt einstakt virki hevur, geografiskt sæð og tekur støðu hareftir.«

Som nyt § 2, II, a) stk. 3 indsættes:

»Landsstyret tager i betragtning de fordele og ulemper, som hver enkelt virksomhed har geografisk set og begrunder sin holdning herefter.«

2. viðgerð 7. mai. Atkvøðugreiðsla 8. mai. Broytingaruppskot frá Ova Mikkelsen og Adolf V. Hansen samtykt við 24-2. Broyting frá Adolf V. Hansen fall við 8-0.

Uppskot landsstýrisins § 1 soleiðis broytt samtykt við 28-0, § 2 við 28-0, § 3 uttan atkvøðugreiðslu. At fara til 3. viðgerð samtykt við 30-0.

9. mai. Broytingaruppskot framlagt av Jógvan Sundstein, Asbjørn Joensen, Svend Åge Ellefsen og Øssi Dam Jacobsen.

3. viðgerð sama dag. Broytingaruppskotið samtykt við 21-0. Uppskot landsstýrisins við broyting til § 1, 1. pkt. endaliga samtykt við 31-0.

F.L. 1413-5-1. Lóg nr. 49 frá 28. mai 1984.

# 88. Føroysk fiskiveiða í grønlendskum sjógvi.

Ár 1984, týsdagin 20. mars legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið velur 6-manna nevnd við einum limi úr hvørjum tingflokki, ið skal kanna hvørjar avleiðingar sáttmáli grønlendinga við EEC kemur at fáa fyri føroyska fiskiveiði í grønlendskum sjógvi.

Kanningarúrslitið skal greiðast sum skjótast og leggjast fyri løgtingið ikki seinni enn 10. apríl komandi, og tekur tá løgtingið málið aftur til umrøðu.

**Greinagerð:**

Sum kunnugt hevur grønlendska landsstýrið gjørt sáttmála við EEC um fiskiveiði í grønlendskum sjógvi, ið skal koma í gildi, tá ið Grønland 1. januar 1985 fer burtur úr hesum felagsskapi.

Vit føroyingar leggja okkum ikki út í grønlendsk viðurskifti, men verunleikin er tann, at vit føroyingar síðan 1925 hava veitt við Grønland og enn veiða har, tí er tað umráðandi at fáa kannað, hvussu viðurskifti okkara verða har, aftaná at hesin sáttmáli er komin í gildi.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 8. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð framlagt av Tjóveldisflokkinum 14. mars 1984 og undir 1. viðgerð 23. í s.m. beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur løgmaður verið á fundi og greitt frá málinum.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Hilmar Kass, Jógvan Sundstein og Agnar Nielsen) leggur fram frágreiðing dagfest 5. apríl 1984 frá Árna Olafsson, skrivstovustjóra, og hevur meirilutin álit á, at kanningararbeiðið viðvíkjandi føroyskari fiskiveiði í grønlendskum sjógvi best verður gjørt av landsstýrinum og setir sostatt einki uppskot fram.

Ein minniluti (Jørgen Thomsen) tekur støðu í tingsalinum.

Ein annar minniluti (Petur Reinert og Karin Kjølbro) førir fram:

Tað er skilligt, at prísur grønlendinga fyri at sleppa burtur úr tí felagsskapi, ið teir móti vilja sínum vóru tvingaðir inn í, hevur verið høgur, og eisini er vitað, at hesin sáttmáli teirra við EEC hevur møtt almiklari mótstøðu teirra millum. Sáttmálin er talandi dømi um, hvussu EEC nýtir atstøðu sína til at boyggja fólk, ið er illa fyri, undir vald sítt og peningaligu og vinnuligu áhugamál (Deutsche Hochseefischerei). Hetta er so mikið harmiligari, tá vit vita, at danska ríkisvaldið, ið tó skuldi átt vissar skyldur mótvegis grønlendingum, hevur verið við í hesum leiki.

Aftan á stívliga tíggju ára beinleiðis luttøku í EEC er tað týðiligt, at grønlendingar — til tess yvirhøvur at sleppa burtur úr hesum tvingsli — hava ikki átt annað í at velja enn at ganga undir hesar hørðu treytir. Grønland fer formliga burtur úr EEC 1. januar 1985, men framvegis verður týdningarmikil partur av búskapi teirra undir EEC-stýring og ræði.

Við limaskapi sínum í EEC kemur tað alt meira og meira fram í ljósið, at tað er gjøgnum Danmark og við hjálp Danmarkar og væl signilsi, at EEC er ført fyri at reka yvirgangspolitikk sín í Norður-atlantshavi í Grønlandi og Føroyum. Við hesum limaskapi er tað vorðið so, at danska ríkisvaldið yvir Grønlandi og Føroyum í mongum lutum í veruleikanum er ikki til longur, men at hesir donsku ríkispartar verða stjórnaðir úr húsi Karls mikla í Bruxelles.

Longu við limaskapi Danmarkar í EEC fór hin hálovaði danski ríkisborgararættur okkara í søguna. Hetta er so eitt. Har afturat kemur, at hesin limaskapur — eisini aftan á at Grønland er farið burtur úr — framvegis forðar fyri náttúrligum og beinleiðis viðskiftum grønlendinga og okkara millum. Leiðin millum Tórshavn og Nuuk kemur framvegis at ganga um Bruxelles, har avgerðirnar verða tiknar. Og fyri hvønn stert, ið vit veiða í danska

ríkispartinum Grøulandi, skulu vit framvegis lata EEC-skip (Deutsche Hochseefisherei) hava fult endurgjald í okkara sjógvi.

Og kann hetta ikki sigast vera í samljóð við rammusáttmála okkara við EEC.

Soleiðis eru kor grønlendinga og okkara sum borgarar í danska ríkinum.

Vit føroyingar nugu harmast um framferð EEC's og Danmarkar mótvegis grønlendska fólkinum og dýru áhugamálum tess, men noyðast sjálvsagt at taka sáttmála Grønlands við EEC til eftirtektar — tann partin, ið viðvíkir okkum. Har vóru vit jú yvirhøvur ikki spurdir um nakað sum helst — uttan hvat ið løgmaður okkara á einumhvørjum loymifundi í Keypmannahavn er gingin undir.

Tað má eisini haldast, at hesin grønlendski EEC-sáttmáli framvegis kemur at forða fyri nóg miklum veiðikvotum til tey skip, ið skulu landa fisk til Nordafar-støðina í Føroyingahavnini.

Vit sleppa heldur ikki uttan um, at hesin sáttmáli kemur at virka sum forðan fyri tí grønlendsk-føroyska-íslendska samstarvi, sum roynt verður at fáa í lag. Men Høvuðslærdómur okkara av hesum máli er tann, at hin hálovaði danski ríkisborgararættur okkara framvegis er settur út av spælinum, og at tað er EEC-politikkur Danmarkar, sum hevur ábyrgdina av hesum.

Vit eiga tí at lata donsku ríkisstjórnina vita, at tá ið vit føroyingar ikki hava danskan ríkisborgararætt í Danmørk (Grønlandi), so kunnu danir ikki rokna við tilsvarandi rættindum í Føroyum og í føroyskum sjógvi. Hetta týðir so m.a. tað, at donsk skip, har í millum donsk laksaveiðiskip, fáa ikki loyvi til at veiða á landleið okkara.

So statt setir minnilutin fram hetta

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Av tí at donsku ríkisborgararættindini føroyinga í Danmørk (Grønlandi) við sáttmálanum millum EEC og Grønland framvegis verða skerd, eisini aftaná at Grønland er farið úr EEC, áleggur løgtingið landsstýrinum at gera donsku stjórnina kunnuga við, at tilsvarandi skerjingar verða settar í verk viðvíkjandi rættindum dana í Føroyum og í føroyskum sjógvi. Samstundis verður sáttmáli okkara við EEC tikin til umhugsunnar.

2. viðgerð 8. mai. Uppskotið til samtyktar frá minnilutanum í marknaðarnevndini fall við 6-0 atkvøðum.

---

# 89. Løgtingslóg um vernd av dýrum.

Ár 1984, týsdagin 20. mars legði Páll Vang, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um vernd av dýrum.**

**1. kapittul.**
**Viðferð av dýrum.**

**§ 1.** Dýr skulu viðfarast forsvarliga og skulu ikki av vanrøkt, overving ella á annan hátt vera fyri óneyðugari líðing.

**§ 2.** Hvør, sum heldur dýr, skal syrgja fyri, at dýrið fær nóg mikið og hóskandi fóður og drekka, og at tað í aðrar mátar verður hildið og røkt forsvar-

**lagtingslov om værn for dyr.**

**Kapitel 1.**
**Behandling af dyr.**

**§ 1.** Dyr skal behandles forsvarligt og må ikke ved vanrøgt, overanstrengelse eller på anden måde udsættes for unødig lidelse.

**§ 2.** Enhver, der holder dyr, skal drage omsorg for, at dyret får tilstrækkeligt og egnet foder og drikke, og at det iøvrigt passes og plejes forsvarligt, herunder

liga, herundir at tilhaldsrúm hjá dýrinum er forsvarliga innrættað.

§ 3. Ikki er loyvt:

1. við helsi, tjórið ella øðrum útbúningi at tarna dýri í rørsluni solciðis, at hetta elvir dýrinum pínu ella hindrar tí at fáa neyðturvuliga hvild,

2. at sláa dýr við lutum, ið eru skikkaðir at valda dýrinum ábrek ella svára pínu,

3. at svíða ullina av dýrum í staðin fyri at royta, klippa ella fyri at drepa ótoy,

4. at seta nagla, ståltráð ella líknandi í rennilin á svínum fyri at hindra teimum í at róta í jørðini. Har aftur í móti er loyvt at nýta slættar ringar og agraffir fyri at hindra svínum at róta í jørðini,

5. í samband við at avloysa dýr við burð at nýta kraftól og rossadrátt at taka burðin,

6. at benda horn á seyði við nakkaspenni, fjaðrastáli ella á annan hátt, — tó er loyvt at benda við fjarðastáli ytst á horninum,

7. at tvangsfóðra dýr við gøðing í hyggju,

at dets opholdsrum er forsvarligt indrettet.

§ 3. Det er ikke tilladt:

1. ved bindsel, tøjr eller anbringelse af andre indretninger at hemme dyrs bevægelsesfrihed på en måde, der volder dyret smerte eller hindrer det i at opnå fornøden hvile,

2. at slå dyr med genstande, der er egnede til at volde dyret beskadigelser eller stærke smerter,

3. at anvende afsvidning af dyrs hårlag i stedet for klipning eller for at dræbe utøj,

4. at sætte søm, ståltråd eller lignende i trynen på svin for at hindre dem i at rode i jorden. Det er derimod tilladt at anvende glatte ringe og agraffer til at hindre svin i at rode i jorden,

5. ved forløsning af dyr at anvende kraftmaskiner og hestetræk til udtrækning af fosteret,

6. at afbøje fårs horn med nakkespænde, fjederstål eller på anden måde, — dog er tilladt at afbænde med fjederstål yderst på hornene,

7. at tvangsfodre dyr i fedningsøjemed,

8. at nýta livandi dýr til mál við skjótivenjing og -kapping,
9. at skjóta kóp og onnur størri havdýr við høgli
10. og at stinga, skutla ella høgga grindahvalir ella aðrar smærri hvalir, fyrrenn sýslumaðurin ella grindaformaðurin hevur givið loyvi til hetta.

8. at anvende levende dyr som mål ved øvelses- og kapskydninger,
9. at skyde sæler og andre større havdyr med hagl
10. og at stikke, harpunere eller hugge grindehvaler eller andre småhvaler, førend sysselmanden eller grindeformanden har givet tilladelse hertil.

**§ 4.** Heldur ikki er loyvt:

1. at flyta livandi fisk við at seta stengur, viðjur, krókar ella snørri gjøgnum toknur, kjaft ella líknandi,
2. við viging av livandi fiski at krøkja vektarkrókar í nakran part av fiskinum, og,
3. at nýta onnur livandi geisladýr enn fisk til agn.

§ 4. Det er endvidere ikke tilladt:

1. at transportere levende fisk ved hjælp af stænger, vidjer, kroge eller snore, anbragt gennem gællerne, kæberne eller lignende,
2. ved vejning af levende fisk at stikke den til vægtredskabet hørende krog gennem nogen del af dyret og
3. at bruge andre levende hvirveldyr end fisk som agn.

**§ 5.** Verpingarbúr kunnu einans nýtast við loyvi frá landsdjóralæknanum. Loyvini verða givin fyri 5 ár í senn.

*2. stk.* Landsstýrið ásetur nærri reglur ella tekur avgerð um treytirnar fyri loyvinum og um hald og røkt av dýrunum.

*3. stk.* Landsstýrið kann áseta nærri reglur ella taka avgerð um innrættingina, raksturin og nýtsluna av øðrum framleiðsluháttum av eggum enn tí í 1. og 2. stk. nevnda.

§ 5. Æglægningsbure må kun anvendes med tilladelse fra landsdyrlægen. Tilladelserne meddeles for 5 år ad gangen.

*Stk. 2.* Landsstyret fastsætter nærmere regler eller træffer afgørelse om vilkårene for tilladelse og om dyrenes pasning og pleje.

*Stk. 3.* Landsstyret kan fastsætte nærmere regler eller træffe afgørelse om indretningen, driften og anvendelsen af andre ægproduktionssystemer end det i stk. 1 og stk. 2 nævnte.

*4. stk.* Landsdjóralæknin kann taka eitt loyvi til at nýta verpingarbúr aftur, um grolt ella endurtikið brot er gjørt á treytirnar fyri loyvinum ella á reglurnar fyri haldið og røktina av dýrinum.
*5. stk.* Avgerðir, tiknar eftir 1. og 4. stk., kunnu ikki leggjast fyri annan umsitingarligan myndugleika.

*Stk. 4.* Landsdyrlægen kan tilbagekalde en tilladelse til at anvende æglægningsbure, såfremt der er sket grov eller gentagen overtrædelse af vilkårene for tilladelsen eller af reglerne om dyrenes pasning og pleje.
*Stk. 5.* Afgørelser, der træffes i henhold til stk. 1 og stk. 4, kan ikke indbringes for anden administrativ myndighed.

**§ 6.** Ross, um hvørji váttan frá djóralækna er til skjals um, at tey antin eru útslitin ella vegna aldur, varandi, ólekilig brek ella álvarsligar óvanar eru óhóskandi til brúks, og ross, sum eru avhandað ella afturgoldin av tryggingarfeløgum sum ólekilig og óhóskandi til brúks, skulu ikki handast ella ognast til annað endamál enn til sláturs, uttan so, at landfútin gevur viðurkenning um avhandingina, ella at hon fer fram í sambandi við, at avvarðandi eigindómur ella virki verður avhandað.

**§ 6.** Heste, om hvilke der foreligger erklæring fra dyrlæge om, at de enten er udslidte eller på grund af alder, kroniske, uhelbredelige lidelser eller fremtrædende unoder er uegnede til brug, samt heste, som er overtagne eller erstattede af forsikringsselskaber som uhelbredelige og uanvendelige til brug, må ikke overdrages eller erhverves til andet formål end slagtning, medmindre landfogeden meddeler samtykke til overdragelsen, eller denne sker i forbindelse med overdragelse af den ejendom eller virksomhed, ved hvilken hesten benyttes.

**§ 7.** Dýr kunnu ikki verða vand til framsýning, sirkussýning, filmsupptøku ella líknandi, um hetta elvir dýrinum mein ella álvarsliga pínu.
*2. stk.* Villini dýr kunnu ikki verða nýtt til framsýning í sirkus, variete og líknandi virmu. Framsýning av dýrum í ferðandi

**§ 7.** Dyr må ikke dresseres eller bruges til fremvisning, cirkusforestillinger, filmsoptagelser eller lignende, såfremt dyret herved påføres skade eller alvorlig smerte.
*Stk. 2.* Vilde dyr må ikke anvendes ved forestillinger i cirkus, varieteer og lignende virksomheder.

dýrasøvnum er ikki loyvd.

*3. stk.* Dýragarðar, dýralundir og líknandi kunnu ikki setast á stovn uttan loyvi frá landsfútanum. Landsstýrið kann gera nærri reglur um eftirlit við slíkari vinnu og um tilhaldsrúm og búr v.m. hjá dýrunum.
*4. stk.* Landsstýrið kann geva undantaksloyvi frá avgerðini í 2. stk., 1. punktum.

Fremvisning af dyr i omrejsende menagerier må ikke finde sted.
*Stk. 3.* Zoologiske haver, dyreparker og lignende må ikke oprettes uden landsfogedens tilladelse. Landsstyret kan give nærmere forskrifter om tilsyn med sådanne virksomheder og om dyrenes opholdsrum, bure m.v.
*Stk. 4.* Landsstyret kan meddele undtagelse fra bestemmelserne i stk. 2, 1. pumktum.

## 2. kapitul.
## Avlíving og skurðviðgerð v.m.

**§ 8.** Tann, sum ætlar at avliva eitt dýr, skal vissa sær, at dýrið verður dripið so skjótt og pínuleyst sum gjørligt. Størri dýr, serliga ross og neyt, sum vegna ábrek, herundir beinbrot, mugu avlívast, kunnu ikki flytast til sláturs, men skulu avlívast á staðnum.

**§ 9.** Gelding av dýrum kann bert gerast av djóralækna og skal gerast undir nýtslu av doyving.

*2. stk.* Gelding av hundum og kattum má bert verða gjørd, um tað er heilsuliga áneyðugt.

*3. stk.* Gelding av grísum og kálvum, sum ikki eru meir enn 1 mánað gamlir, og veðurlomb, sum ikki eru meira enn 2 mán-

## Kapitel 2.
## Aflivning og operative indgreb m.v.

**§ 8.** Den, der vil aflive et dyr, skal sikre sig, at dyret dræbes så hurtigt og så smertefrit som muligt. Større dyr, særlig heste og kvæg, der på grund af tilskadekomst, herunder benbrud, skal aflives, må ikke transporteres til slagtning, men skal dræbes på stedet.

**§ 9.** Kastration af dyr må kun foretages af en dyrlæge og skal finde sted under anvendelse af bedøvelse.
*Stk. 2.* Kastration af hunde og katte må kun ske, hvis det af helbredsmæssige hensyn er påkrævet.
*Stk. 3.* Kastration af grise og kalve, der ikke er over 1 måned gamle, og vædderlam, som ikke er mere end 2 måneder gamle

aðar gomul, kann verða gjørd av øðrum enn djóralæknum og uttan nýtslu av doyving.

**§ 10.** At kuta halan av rossum og neytum og oyruni og halan av hundum kann bert verða gjørt, um tað er heilsuliga áneyðugt. Hetta kann bert gerast av djóralækna og skal gerast undir nýtslu av doyving.

**§ 11.** At taka horn av dýri kann bert verða gjørt, um tað er heilsuliga ella vinnuliga áneyðugt. Hetta kann bert gerast av djóralækna og skal gerast undir nýtslu av doyving.
*2. stk.* At taka knavar av kálvum, sum ikki eru meira enn 1 mánað gamlir, kann gerast av øðrum enn djóralækna, tá ið loyvi er fingið frá landsdjóralæknanum fyri hesum.
*3. stk.* Avgerðir eftir 2. stk. kunnu ikki leggjast fyri annan umsitingarligan myndugleika.

**§ 12.** Aðrar skurðviðgerðir hjá dýrum enn tær í §§ 9-11 nevndu, sum kunnu elva dýrinum líðing, undantikið smávegis og stuttvarandi pínu, kunnu bert gerast av djóralækna, uttan so, at viðgerðin kann ætlast at vera bráðneyðug.

kan foretages af andre end dyrlæger og uden anvendelse af bedøvelse.

**§ 10.** Kupering af halen på heste og køer og af ørerne og halen på hunde må kun ske, hvis det af helbredsmæssige hensyn er påkrævet. Den må kun foretages af en dyrlæge og skal finde sted under anvendelse af bedøvelse.

**§ 11.** Fjernelse af horn på dyr må kun ske hvis det af helbredsmæssige eller driftsmæssige hensyn er påkrævet. Den må kun foretages af en dyrlæge og skal finde sted under anvendelse af bedøvelse.
*Stk. 2.* Fjernelse af hornanlæg på kalve, som ikke er mere end 1 måned gamle, kan foretages af andre end dyrlæger, når der foreligger tilladelse fra landsdyrlægen.
*Stk. 3.* Afgørelser i henhold til stk. 2 kan ikke indbringes for anden administrativ myndighed.

**§ 12.** Andre operative indgreb på dyr end de i §§ 9-11 omhandlede, der kan påføre dyret lidelse, bortset fra uvæsentlig smerte af rent forbigående beskaffenhed, må kun foretages af en dyrlæge, medmindre behandlingens iværksættelse må anses for uopsættelig.

### 3. kapittul.
### Eftirlit við, at lógiu verður hildin v.m.

**§ 13.** Tann, sum kemur fram á eitt dýr, ið er eyðsýnt sjúkt, skatt ella hjálparleyst, hevur skyldu eftir førimuni at veita dýrinum hjálp.
*2. stk.* Vegfarandi skulu hava fyrilit og vísa varsemi við dýrum, ið eru á ella við veg. Við ákoyring eru ásetingarnar í 1. stk. galdandi.

**§ 14.** Um eitt dýr av undirfóðring er so avmergjað ella avmaktað, at støðan hjá tí er óforsvarlig, kann løgreglan við eini dagligari bót áleggja eigaranum ella tí, sum hevur dýrið í hondum, at gera tiltak til, at dýrið verður fóðrað forsvarliga. Haraftrat kann løgreglan, um fóðringarstøðan ella heilsustøðan hjá dýrinum ger tað neyðugt, somuleiðis við at áleggja dagligar bøtur forbjóða brúk av tí fyri eitt tíðarskeið upp til 2 mánaðir, og hendan freistin kann framleingjast, tó bert fyri 2 mánaðir í senn. Nevndu álegg, sum bert kunnu setast í verk eftir umbidnari váttan frá djóralækna, skulu vera til skjals skrivliga og fevna um ta í 2. stk. nevndu freist fyri at leggja málið fyri landsdjóralæknan.
*2. stk.* Tann, sum fær álegg eftir 1. stk., kann krevja spurningin,

### Kapitel 3.
### Tilsyn med lovens overholdelse m.v.

**§ 13.** Den, der kommer frem til et dyr, so er øjensynligt sygt, skadet eller hjælpeløst, har pligt til efter evne at yde dyret hjælp.
*Stk. 2.* Trafikanter skal optræde hensynsfuldt og udvise agtpågivenhed over for dyr, der færdes på eller ved vej. Ved påkørsel gælder bestemmelserne i stk. 1.

**§ 14.** Såfremt et dyr på grund af underernæring er så afmagret eller afkræftet, at dets tilstand er uforsvarlig, kan politiet under en daglig bøde pålægge ejeren eller den, hvem omsorgen for dyret påhviler, at træffe foranstaltning til, at dyret fodres på en forsvarlig måde. Endvidere kan politiet, hvis et dyrs ernæringstilstand eller helbredstilstand gør det påkrævet, ligeledes under pålæg af daglige bøder, forbyde brugen af det for et tidsrum af indtil 2 måneder, hvilken frist kan forlænges, dog kun for 2 måneder ad gangen. de nævnte pålæg, der kun kan udfærdiges efter indhentet erklæring fra en dyrlæge, skal foreligge skriftligt og indeholde oplysning om den i stk. 2 nævnte frist for sagens indbringelse for landsdyrlægen.
*Stk. 2.* Dem, over for hvem der

um grundarlag er fyri áleggjinum, lagdan fyri landsdjóralæknan áðrenn eina freist uppá 3 dagar frá tí, at áleggið verður givið. Í førum, har váttanin frá djóralæknanum sigur, at grundarlag ikki er fyri áleggi, kann løgreglan áðrenn eina freist upp á 3 dagar frá tí, at áleggið verður givið, leggja málið fyri landsdjóralæknan. Sigur váttanin frá landsdjóralæknanum, at grundarlag er fyri, at áður givin álegg standa við, ella at álegg nú verða givin, fær eigarin ella tann, sum hevur dýrið í hondum, frásøgn um hetta við tilskilan um, at hann við at venda sær til løgregluna áðrenn 14 dagar eftir, áleggið er givið, kann krevja málið lagt fyri rættin.

*3. stk.* Kemur krav rættstundis til løgregluna um avgerð í rættinum, skal løgreglan syrgja fyri, at áleggið verður roynt í rættinum antin undir tí móti viðkomandi møguliga reista máli fyri brot á hesa lóg ella undir einum fyri viðkomandi undirrætt serliga reist mál. Verður spurningurin um rættargylduna av givna áleggjinum lagdur fyri dómstólarnar, hevur hetta ikki við sær, at áleggið verður útsett.

*4. stk.* Avgerðin hjá rættinum um áleggið verður tikin við úrskurði, sum ikki kann skjótast fyri hægri rætt.

*5. stk.* Gevа váttanirnar frá djóralæknanum ella landsdjóralækni i medfør af stk. 1 meddeles pålæg, kan begære spørgsmålet, om der er grundlag for pålægget, indbragt for landsdyrlægen inden for en frist af 3 dage fra pålæggets meddelelse. I tilfælde, hvor dyrlægens erklæring går ud på, at der ikke er grundlag for noget pålæg, kan politiet indenfor en frist af 3 dage fra pålæggets meddelelse, indbringe sagen for landsdyrlægen. Såfremt landsdyrlægens erklæring giver grundlag for, at de tidligere meddelte pålæg opretholdes, eller at der nu meddeles pålæg, underrettes ejeren eller den, som omsorgen for dyret påhviler, herom med tilkendegivelse af, at han ved henvendelse til politiet inden 14 dage fra pålæggets modtagelse kan begære sagen indbragt for retten.

*Stk. 3.* Fremkommer rettidig begæring til politiet om retslig afgørelse, påhviler det politiet at foranledige pålægget prøvet af retten enten under den mod pågældende eventuelt rejste sag for overtrædelse af denne lov eller under en for vedkommende underret rejst særlig sag. Indbringelse for domstolene af spørgsmålet om retsgyldigheden af det meddelte pålæg medfører ikke udsættelse af dette.

*Stk. 4.* Rettens afgørelse vedrørende pålægget træffes ved kendelse, der ikke kan indbringes for højere ret.

anum grundarlag fyri, at áleggið verður givið, hevur eigarin ella tann, sum hevur dýrið í hondum, skyldu at bera útreiðslurnar av váttanini. Fyri váttanina frá landsdjóralæknanum er hetta bert galdandi, um eigarin ella tann, sum hevur dýrið í hondum, hevur kravt, at málið varð lagt fyri landsdjóralæknan, og tá skulu bert beinleiðis útreiðslurnar til flutning v.m. gjaldast aftur.

*Stk. 5.* Såfremt dyrlægens eller landsdyrlægens erklæring giver grundlag for meddelelse af pålæg, er dyrets ejer eller den, som omsorgen for dyret påhviler, pligtig at afholde de med erklæringen forbundne udgifter. Forsåvidt angår landsdyrlægens erklæring gælder dette dog kun, dersom sagen af ejeren eller den, som omsorgen for dyret påhviler, er begæret indbragt for landsdyrlægen, og kun de positive udgifter til befordring m.v. vil være at erstatte.

**§ 15.** Í føri har undirfóðring av einum dýri, hóast álegg eftir § 14. 1. stk., áhaldandi fer fram ella, har mishandling av einum dýri fyriliggur, kann løgreglan flyta dýrið burtur og antin seta tað aðra staðni ella, um støðan hjá tí er sovorðin, at tað eftir umbidnari váttan frá landsdjóralæknanum ikki eigur at liva, lata tað avlíva. Útreiðslurnar av hesum ber eigarin ella tann, sum hevur dýrið í hondum.

**§ 15.** I tilfælde, hvor der til trods for pålæg i medfør af § 14, stk. 1, fortsat finder underernæring sted af et dyr, eller hvor mishandling af et dyr foreligger, kan politiet fjerne dyret og enten anbringe det andetsteds eller, såfremt dets tilstand er sådan, at det efter indhentet erklæring fra landsdyrlægen ikke bør leve, lade det aflive. Udgifterne, der er forbundet dermed, påhviler ejeren eller den, som omsorgen for dyret påhviler.

**§ 16.** Tað er skylda hjá hvørjum djóralækna, sum kemur til eitt skatt ella sjúkt dýr, ið hann metir, ikki kann lekjast, og at tað fer at hava óneyðuga líðing við sær, at lata tað liva, beinan vegin at fáa tað dripið, um eigarin ella tann, sum hevur dýrið í hondum, samtykkir í hesum,

**§ 16.** Det påhviler enhver dyrlæge, som tilser et tilskadekommet eller sygt dyr, om hvilket han mener, at det ikke kan helbredes, og at det vil medføre unødvendig lidelse at lade det leve, straks at foranledige det dræbt, såfremt ejeren eller den, som omsorgen for dyret påhviler, erklærer sig

og um dýrið er tryggjað, at játtan frá tryggingarfelagnum er fingin. Eru hesar treytir ikki uppfyltar, er tað skylda hjá djóralæknanum beinan vegin at greiða løgregluni frá viðurskiftunum.

*2. stk.* Tá ið løgreglan fær slíka frágreiðing, skal hon alt fyri eitt biðja um váttan frá landsdjóralæknanum.

*3. stk.* Fær løgreglan á annan hátt kunnleika til, at eitt skatt ella sjúkt dýr er í slíkari støðu, at fortreytirnar fyri, at tað skal avlívast sambært 1. stk. kunnu ætlast at vera til staðar, skal váttan somuleiðis fáast frá djóralækna. Sigur váttanin frá djóralæknanum, at dýrið eigur at verða avlívað, skal tað avlívast alt fyri eitt, um eigarin ella tann, sum hevur dýrið í hondum, váttar, at hann er samdur við hetta og, um dýrið er tryggjað, játtan frá tryggingarfelagnum er fingin. Eru hesar treytir ikki loknar, skal løgreglan alt fyri eitt biðja um váttan frá landsdjóralæknanum.

*4. stk.* Um váttanin frá landsdjóralæknanum eftir 2. og 3. stk. sigur, at dýrið eigur at verða avlívað, skal hetta gerast alt fyri eitt.

*5. stk.* Í øllum førum, har avlíving skal finna stað, skal eigarin ella tann, sum hevur dýrið í hondum, hava skrivlig boð um hetta. Verða boðini ikki

enig heri, og hvis dyret er forsikret, foraikringsselskabets samtykke foreligger. Er disse betingelser ikke opfyldt, påhviler det dyrlægen omgående at indberette forholdet til politiet.

*Stk. 2.* Når politiet modtager sådan indberetning, indhentes der straks erklæring fra landsdyrlægen.

*Stk. 3.* Kommer politiet ad anden vej til kundskab om, at et tilskadekommet eller sygt dyr befinder sig i en sådan tilstand, at betingelserne for dets aflivning i medfør af stk. 1 må antages at foreligge, indhentes der ligeledes erklæring fra en dyrlæge. Går dyrlægens erklæring ud på, at dyret bør aflives, sker aflivningen straks, såfremt ejeren eller den, som omsorgen for dyret påhviler, erklærer sig enig heri, og hvis dyret er forsikret, forsikringsselskabets samtykke foreligger. Er disse betingelser ikke opfyldt, indhenter politiet straks erklæring fra landsdyrlægen.

*Stk. 4.* Dersom den fra landsdyrlægen i medfør af stk, 2 eller stk. 3 indhentede erklæring går ud på, at dyret bør aflives, skal aflivning straks finde sted.

*Stk. 5.* I alle tilfælde, hvor aflivning skal finde sted, meddeles der ejeren eller den, som omsorgen for dyret påhviler, skriftligt pålæg herom. Såfremt pålægget ikke straks efterkommes,

fylgd alt fyri eitt, skal løgreglan syrgja fyri, at dýrið verður avlívað.

*6. stk.* Tá ið tað hevur við sær óneyðugar, álvarsamar líðingar fyri eitt dýr, at tann í oman fyri nevndu reglum fyriskrivaða mannagongd verður brúkt, kann avlíving av einum skaddum dýri tó altíð verða gjørd alt fyri eitt, um tað er eyðsýnt, at dýrið ikki fer at koma undan meininum ella sum fylgja av hesum eftir fyriskrivaðu mannagongdini kortini verður avlívað.

*7. stk.* Eigarin ella tann, sum hevur dýrið í hondum, ber útreiðslurnar av avlívingini av dýrinum. Útreiðslurnar fyri at fáa ta í 3. stk. nevndu djóralæknaváttan ber tað almenna, um avgerðin er, at dýrið ikki skal avlívast, er tað mótsatt, ber eigarin ella tann, sum hevur dýrið í hondum tær. Um váttanin frá landsdjóralæknanum eftir 2. og 3. stk. sigur, at avlíving eigur at fara fram, hevur eigarin ella tann, sum hevur dýrið í hondum — ella tryggingarfelagið, um málið einans er lagt fyri landsdjóralæknan vegna tørvandi samtykki frá hesum — skyldu at endurrinda beinleiðis útreiðslurnar til flutning v.m. Annars ber tað almenna útreiðslurnar til landsdjóralæknan. Allar útreiðslur kunnu vera bornar av løgregluni sum forskot.

sker aflivningen ved politiets foranstaltning.

*Stk. 6.* Når det ville medføre unødige, alvorlige lidelser for et dyr, at den i de foranstående bestemmelser foreskrevne fremgangsmåde anvendes, kan aflivning af et tilskadekommet dyr dog altid finde sted straks, såfremt det er åbenbart, at dyret ikke vil overleve skaderne eller som følge af disse efter den foreskrevne fremgangsmåde alligevel ville blive aflivet.

*Stk. 7.* Udgiften ved aflivning påhviler dyrets ejer eller den, som omsorgen for dyret påhviler. Udgiften ved tilvejebringelsen af den i stk. 3 nævnte dyrlægeerklæring påhviler det offentlige, såfremt afgørelsen går ud på, at aflivning ikke skal finde sted, medens den i modsat fald påhviler dyrets ejer eller den, som omsorgen for dyret påhviler. Såfremt den af landsdyrlægen i medfør af stk. 2 og stk. 3 afgivne erklæring går ud på, at aflivning bør finde sted, er ejeren eller den, som omsorgen for dyret påhviler – eller forsikringsselskabet, hvis sagen alene er forelagt landsdyrlægen på grund af manglende samtykke fra dette — pligtig at erstatte de positive udgifter til befordring m.v.; iøvrigt afholdes udgifterne til landsdyrlægen af det offentlige. Samtlige udgifter kan forskudsvis afholdes af politiet.

## 4. kapittul.
## Almennar reglur og revsireglur v. m.

§ 17. Landsstýrið kann áseta reglur ella taka avgerð um flutning, slátur, avlíving, narking og serliga viðferð annars av dýrum.

§ 18. Vinnuligur handil við dýrum frá handli ella føstum sølustað kann bert fara fram við loyvi frá løgregluni. Loyvið kann verða tikið aftur, um tann handlandi verður revsaður fyri brot á hesa log ella, um dýrini ikki vera hildin og røkt forsvarliga.
*2. stk.* Reglan í 1. stk. er ikki galdandi fyri handil við rossum, neytum, svínum, seyði, geitum, kaninum, loðdýrum, flogfenaði og fiski.

§ 19. Tann, sum við overving, vanrøkt ella á annan hátt fer óforsvarliga við dýrum, verður revsaður fyri dýrplágarí við bót, hefti ella fongsli í upp til 1 ár. Hava viðurskiftini borið eyðkenni av mishandling, er revsingin fongsul í upp til 1 ár, við uppafturtøku í 2 ár.
*2. stk.* Tann, sum annars ger brot á reglurnar í hesi lóg ella á reglur ásettar eftir hesi lóg, verður revsaður, uttan so at annað er

## Kapitel 4.
## Almindelige bestemmelser og straffebestemmelser m.v.

§ 17. Landsstyret kan fastsætte bestemmelser eller træffe afgørelse om dyrs transport, slagtning, aflivning, mærkning og deres behandling i anden særlig retning.

§ 18. Erhvervsmæssig handel med dyr fra butik eller andet fast forretningssted må kun ske med politiets tilladelse. Tilladelsen kan til enhver tid tilbagekaldes, såfremt den handlende straffes for overtrædelse af denne lov, eller såfremt dyrene ikke passes og plejes forsvarligt.
*Stk. 2.* Bestemmelsen i stk. 1 finder ikke anvendelse på handel med heste, kvæg, svin, får, geder, kaniner, pelsdyr, fjerkræ og fisk.

§ 19. Den, som ved overanstrengelse, vanrøgt eller på anden måde behandler dyr uforsvarligt, straffes for dyrplageri med bøde, hæfte eller med fængsel indtil 1 år. Har forholdet haft karakter af mishandling, er straffen fængsel indtil 1 år, i gentagelsestilfælde 2 år.
*Stk. 2.* Den, som iøvrigt overtræder de i denne lov indeholdte eller i medfør af loven udstedte forskrifter, straffes, forsåvidt

ásett, við bót ella hefti. Á sama hátt verður tann revsaður, sum skúgvar treytirnar fyri cinum loyvi eftir lógini ella eftir reglum eftir lógini til viks ella letur vera við at fylgja forboðum ella boðum, sum eru givin eftir lógini ella eftir reglum eftir lógini.

*3. stk.* Skúgvar ein djóralækni fráboðanarskyldu sína eftir § 16, 1. stk. til viks, verður hann revsaður við bót.

*4. stk.* Er eitt brot gjørt av einum partafelagi, lutafelagi ella líknandi, kann bótarskyldan verða áløgd felagnum sum slíkum.

ikke andet er bestemt, med bøde eller hæfte. På samme måde straffes den, som tilsidesætter vilkår for en tilladelse i henhold til loven eller i henhold til forskrifter udstedt i medfør af loven eller undlader at efterkomme forbud eller påbud, der er meddelt i henhold til loven eller i henhold til forskrifter udstedt i medfør af loven.

*Stk. 3.* Tilsidesætter en dyrlæge sin anmeldelsespligt efter § 16, stk. 1, straffes han med bøde.

*Stk. 4.* Er en overtrædelse begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan bødeansvar pålægges selskabet som sådant.

**§ 20.** Tann, sum er dømdur sekur fyri mishandling av dýrum, eins og tann, sum fyri áður at hava gjørt seg sekan í dýrplágarí ella í øðrum broti av reglunum í hesi lóg ella í § 196 í borgarligu revsilógini av nýggjum verður sekur í slíkum broti, kann við dóminum fyri allar tíðir ella fyri eitt nærri avmarkað tíðarskeið verða frásagdur rættin til at eiga, brúka, halda ella slakta ella sum heild fáast við dýr persónliga. Forboðið kann avmarkast til at viðvíkja ávísum sløgum av dýrum. Brot á forboðið verður revsað við bót. Løgreglan kann flyta dýrið og selja tað ella avlíva tað, um ikki eigarin áðrenn eina freist, ið løgreglan ásetir, syrgir fyri, at dýrið

**§ 20.** Den, der ved dom findes skyldig i mishandling af dyr, såvel som den, der efter tidligere at have gjort sig skyldig i dyrplageri eller i anden overtrædelse af forskrifterne i denne lov eller i § 196 i borgerlig straffelov påny findes skyldig i sådan overtrædelse, kan ved dommen for bestandig eller for et nærmere fastsat tidsrum frakendes retten til at eje, bruge, passe eller slagte eller i det hele at beskæftige sig personligt med dyr. Forbudet kan begrænses til at angå bestemte arter af dyr. Overtrædelse af forbudet straffes med bøde. Politiet kan fjerne dyret og lade det sælge eller aflive, medmindre ejeren inden en af politiet fastsat frist drager om-

verður sett aðrastaðni. Útreiðslurnar, ið standast av hesum, verða bornar av tí, ið brotið hevur forboðið.

*2. stk.* Tann, sum við vitan um eitt slíkt forboð, letur ein persón, hvørs rættur til at fáast við dýr heilt ella partvís er frádømdur eftir 1. stk., í tænastu síni útinna eitt verk, ið er móti forboðnum, verður revsaður við bót.

§ 21. Tað áliggur foreldrum, verja, húsbónda og øðrum, sum hava umsjón við børnum undir 15 ár, at syrgja fyri, at hesi ikki gera seg sek í broti á hesa lóg. Verður slíkt lógarbrot gjørt av barni undir 15 ár, verður tann revsaður, ið umsjónina hevur, um hann er vitandi um brotið, uttan at hann hevur roynt at fyribyrgja tí.

*2. stk.* Er groft ósketni frá tí, ið umsjónina hevur, orsøk til, at hann er óvitandi um brotið, sum barnið hevur gjørt, verður hann revsaður við bót ella hefti.

§ 22. Sakarmál um brot á hesa lóg verða viðgjørd sum løgreglumál.

*2. stk.* Útreiðslurnar eftir hesi lóg verða, uttan so at annað er ásett, bornar av tí almenna sum útreiðslur hjá løgregluni.

sorg for dyrets anbringelse andetsteds. Udgifterne ved de af politiet trufne foranstaltninger påhviler den, der har overtrådt forbudet.

*Stk. 2.* Den, der med viden om et sådant forbud lader en person, hvem retten til at beskæftige sig med dyr helt eller delvis er fra frakendt i medfør af stk. 1, i sin tjeneste udøve en virksomhed, der strider mod forbudet, straffes med bøde.

§ 21. Det påhviler forældre, værge, husbond og andre, der har tilsyn med børn under 15 år, at drage omsorg for, at disse ikke gør sig skyldige i overtrædelse af denne lov. Begås sådan lovovertrædelse af et barn under 15 år, straffes den tilsynsførende for overtrædelsen, såfremt den er begået med hans vidende, uden at han har forsøgt at forhindre det.

*Stk. 2.* Skyldes det grov uagtsomhed fra den tilsynsførendes side, at han har været uvidende om den af barnet begåede overtrædelse, straffes han med bøde eller hæfte.

§ 22. Sager om overtrædelse af denne lov behandles som politisager.

*Stk. 2.* Udgifter i henhold til denne lov afholdes, forsåvidt ikke andet er bestemt, af det offentlige som udgifter vedrørende politivæsenet.

**§ 23.** Lógin kemur í gildi, tá hon verður kunngjørd.
*2. stk.* Samstundis fer lóg nr. 152 frá 17. mai 1916 »om værn for dyr« samb. »anordning« nr. 110 frá 19. mars 1919, og § 196 í borgarligu straffilógini, samb. »lovbekendtgørelse« nr. 215 frá 24. juni 1939, úr gildi.

**§ 23.** Loven træder i kraft ved dens kundgørelse.
*Stk. 2.* Samtidig ophæves lov nr. 152 af 17. maj 1916 om værn for dyr, jfr. anordning nr. 110 af 1. marts 1919, samt § 196 i borgerlig straffelov, jfr. lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1919.

**Viðmerkingar:**
Í februar 1982 setti landsstýrið eitt arbeiðsbólk við teirri uppgávu at kanna djóraverndarlógina og koma við uppskoti til broytingar ella til nýggja lóggávu.

Arbeiðsbólkurin gav álit frá sær tann 16. januar 1984.

Álitið frá arbeiðsbólkinum er hjálagt og er annars til skjals á Landsskrivstovuni.

Omanfyri nevnda lógaruppskot er gjørt við álitinum frá arbeiðsbólkinum sum grundarlag. Tað er stórt sæð einsljóðandi við lógaruppskotið, sum arbeiðsbólkurin hevur skotið upp.

Niðanfyri er nevnt, hvar landsstýrisins uppskot víkir frá uppskotinum frá arbeiðsbólkinum, og hvørjar orsøkirnar eru fyri hesum. Annars verður víst til álitið frá arbeiðsbólkinum, heruppi í til viðmerkingarnar til tað í álitinum uppskotna lógaruppskotið.

*Til § 3, nr. 6:*
Landsstýrisins meting er, at tað eigur at verða loyvt at benda horn á seyði við fjarðastáli, sum verður sett ytst á hornunum, men ikki við nakkaspenni ella á annan hátt.

*Til § 3, nr. 9:*
Landsstýrisins meting er, at ásetanin bert eigur at fevna um størri havdýr og ikki vanlig landdýr.

*Til § 3, nr. 10:*
Hildið verður, at ásetanin eigur at vera meiri liðilig og eigur at verða umsitin soleiðis, at sýslumaðurin ella grindaformaðurin ansar eftir, tá loyvi verður givið eftir hesari ásetan, at grindahvalirnir líða minst møguligt.

*Til § 9, nr. 13:*
Landsstýrið er av teirri fatan, at loyvt eigur at vera uttan loyvi frá almennum myndugleikum at gelda grísar og kálvar, sum ikki eru meir enn ein mánað gamlir, og veðurlomb, sum ikki eru meir enn tveir mánaðir gomul.

Orsakað av hesi broyting landsstýrisins fellur § 9, stk. 4 í uppskotinum frá arbeiðsbólkinum burtur.
*Til § 14, 2. stk.:*
Landsstýrið metir, mótsatt arbeiðsbólkinum, at privatfólk og løgreglan eiga at hava somu freist fyri kæru. Sostatt er freist sett fyri løgregluna at fara til landsdjóralæknan uppá 3 dagar.
*Til § 23, 1. stk.:*
Landsstýrið metir ikki, at neyðugt er við ásetan, um at § 3, stk. 6 fær gildi 1. oktober 1989, vegna broytingaruppskotið, har loyvt er at benda við fjarðastáli á hornunum.

Sí skjal 13.

1. viðgerð 26. mars. Málið varð beint í lóganevndina, sum 8. mai legði fram soljóðandi:

**Álit**

Málið er lagt fram av landsstýrinum 20. mars 1984 og undir 1. viðgerð tann 26. í s.m. beint í lóganevndina.

Lóganevndin hevur viðgjørt málið, men við tað at hetta er eitt stórt og rúgvusmikið mál, sær nevndin seg ikki føra fyri at avgreiða málið eftir so stutta tíð, og mælir nevndin til, at lóganevndin heldur fram sum millumtinganevnd hesum máli viðvíkjandi og setir sostatt fram

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Lóganevndin heldur fram sum millumtinganevnd til ólavsøkutingsetuna til viðgerð av løgtingslóg um vernd av dýrum.

2. viðgerð 9. mai. Uppskotið til samtyktar samtykt við 26-0 atkvøðum.

F.L.j. nr. 1713-13-1.

# 90. Ymiskar konventiónir um altjóða sigling.

Ár 1984, mikudagin 21. mars legði Jóannes Dalsgaard, løgtingsmaður vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt:

1) at normera fulltrúastarv í landsstýrinum at taka sær av sjóvinnumálum burturav,
2) í samráð og samstarvi við hini norðanlondini at skipa vælferðartænastu fyri sjófólk og fiskimenn,
3) at leggja fyri tingið uppskot um at seta tær ríkislógir og altjóða konventiónir, sum eru neyðugar fyri, at føroysk skip ótarnað kunnu sigla á øllum heimsins høvum, í gildi fyri Føroyar,
4) at seta nevnd við umboðum fyri sjómansskúla, skúlafyrisitingina og avarðandi vinnufelagsskapir og fakfeløg at gera uppskot til eina føroyska útbúgving fyri stýrimans- og maskinmeistaraaspirantar,
5) at seta avvarðandi stovnar at fyrireika neyðturviligt skeiðvirksemi í Føroyum fyri teimum sjómonnum, sum manna føroyska handilsflotan.

**Viðmerkingar:**

Føroyski handilsflotin við ferðafólka-, farma- og tangaskipum í altjóða sigling er ein rættiliga nýggj vinna.

Henda vinna hevur tey seinastu árini tikið seg nógv fram í ein ávísan mun við almennum stuðli og í øðrum førum á reint privatum grundarlagi.

Ymist, sum er komið fram í vetur, bendir á, at henda nýggja vinnan hevur ávísar trupulleikar at stríðast við — trupulleikar, sum vinnan sjálv er ósek í, og sum tað almenna kann sleppa hesi nýggju vinnuni undan.

Teir trupulleikar, ið m.a. talan er um, er sambandið við landsumsitingina, har stórur tørvur er á juridiskum sakkønum, sum burturav kann taka sær av sjóvinnumálum. tí mælir Javnaðarflokkurin til, at settur verður fulltrúi í landsstýrinum, sum hurturav skal taka sær av sjóvinnumálum, serstakliga slíkum, sum snúgva seg um altjóða ferðafólka- og farma-, herundir tangaskipasigling.

Av tí vaksandi tali av føroyingum, sum nú sigla úti við føroyskum skipum, stendst stórur tørvur á eini serligari føroyskari vælferðartænastu. Henda tænasta eigur at virka saman við hinum norðanlondunum og her eigur eisini at røkja áhugamálini hjá teimum føroysku fiskimonnum, sum enn søkja fjarleiðirnar. Møguliga átti henda tænasta at umfatað allar siglandi føroyingar.

Høvuðsuppgávan hjá vælferðartænastuni verður at syrgja fyri, at føroyingar fáa bløð, videobond, útvarpsbond, tíðindi, vitjan og í heila tikið at gera sítt til, at manningarnar trívast væl og hava gott samband við heimlandið.

Ein kleppur hjá føroyska handilsflotanum í altjóða sigling er hetta, at nógvar týðandi altjóða konventiónir ikki eru galdandi í Føroyum og hervið ikki umfata skip undir føroyskum flaggi.

Hugsað er her serliga um Marpol konventiónina, um umhvørvisvernd viðvíkjandi olju og kemikalium, um SOLAS-konventiónina, ið snýr seg um trygdar- og bjargingarútgerð umborð í skipum, um S.T.C.W konventiónir, sum treyta, at nóg vælútbúgvið fólk manna skipini. Talan kann eisini vera um aðrar konventiónir, sum til dømis viðvíkja leitan eftir saknaðum sjófólki í samband við vanlukkur o.m.a.

Javnaðarflokkurin metir eisini, at landsstýrið eigur at fara undir at fyrireika eina føroyska stýrimans- og maskinmeistaraaspirantskipan.

Somuleiðis krevur tann nýggi specialfloti, ið føroyingar nú eru við at byggja upp eitt munandi skeiðvirksemi í Føroyum fyri tí sjófólki, sum mannar og kemur at manna henda specialflota.

Eisini eigur landsstýrið at umhugsa lóggávu um tvungna læknakanningar av sjómonnum eins og gjørt verður í okkara grannalondum, sambært ILO-konventiónina.

Spurningurin um endurgjald til reiðaran fyri fría heimferð eins og í Danmark eigur eisini at umhugsast.

Somuleiðis eiga okkara langfarasjómenn ikki at hava verri skattligar sømdir enn teirra starvsfelagar í hinum Norðanlondunum.

Javnaðarflokkurin hevur leingi bíða eftir, at landsstýrið fer at koma við einum útspæli í hesum stóra og álvarsama máli, men tá als einki tekin er um eitt slíkt útspæl — og hesir spurningar ikki kunnu bíða longur, setir flokkurin tí fram frammanfyri standandi uppskot til samtyktar.

1. viðgerð 26. mars. Málið varð beint í lóganevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi:

## Álit

Málið varð framlagt av Javnaðarflokkinum tann 24. mars 1984 og við 1. viðgerð tann 26. s.m. beint í lóganevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Asbjørn Joensen, Arne Ziskasen og Agnar Nielsen) setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jákup Lindenskov og Petur Reinert) mælir til at samtykkja uppskotið frá Javnaðarflokkinum og ger samstundis vart við, at hópin nógvar millumlanda konventiónir — einar 10-15 í tali — bíða eftir støðutakan landsstýrisins.

Minnilutin vísir uppaftur einaferð á, at tað er meira enn óheppið serliga í eini uppbyggingartíð av einum fleirtáttaðum farmaskipaflota, at neyðugt er at vit eisini ganga undir tær millumlanda avtalur, sum flestu av teimum londunum, vit samskifta við, og sum okkara siglandi menn á føroyskum kjøli í løtuni ikki lúka. Hetta kann í mongum førum koma teimum sera illa við.

Eisini mugu vit royna at uppbyggja føroyska vælferðartænastu í sama mun sum uttanlandssigling okkara nørist.

Millum aðrar er at nevna ILO-konventiónina, sum eisini umfatar obligatoriska læknakanning av sjófólki.

Tað fer at koma illa við hjá skipum okkara, sum ikki lúka treytirnar í millumlanda konventiónum, tí onnur lond kunnu koma at krevja konventiónstreytir loknar fyri yvirhøvur at avgreiða okkara skip í fremmandari havn.

2. viðgerð 27. apríl. Atkvøðugreiðslan 1. mai. Pkt. 1 fall við 14-0, pkt. 2 fall við 16-0, pkt. 3 fall við 15-0, pkt. 4 fall við 16-0, pkt. 5 fall við 14-0.

# 91. Løgtingslóg um kollektiva vanlukkutrygging fyri vanlukkur, ið henda undir grindarakstri, grindadrápi og upptøku av grind.

Ár 1984, mikudagin 21. mars legði Karin kjølbro, løgtingslimur fyri Ova Mikkelsen vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um kollektiva vanlukkutrygging fyri vanlukkur, ið henda undir grindarakstri, grindadrápi og upptøku av grind.**

**§ 1.** Landsstýrið teknar eina kollektiva vanlukkutrygging, ið fevnir um vanlukkur, sum henda í samband við grindarakstur, grindadráp og upptøku av grind.

**§ 2.** Landsstýrið ger og kunnger reglugerð um hesa trygging, hvussu vanlukka skal fráboðast, og hvørjar váttanir frá lækna og sýslumanni eru neyðugar.

**§ 3.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om kollektiv ulykkesforsikring vedrørende skader, der sker under jagt efter grind, grindedrab og under oprydning af grind.**

**§ 1.** Landsstyret tegner en kollektiv ulykkesforsikring, der dækker ulykker, der sker i forbindelse med jagt efter grind, grindedrab og oprydning af grind.

**§ 2.** Landsstyret udfærdiger og bekendtgør reglement om denne forsikring, hvordan ulykkestilfælde skal anmeldes og hvilke attester fra læge og sysselmand, der er påkrævet.

**§ 3.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Undirritaði legði hetta lógaruppskot fram á ting hin 18. mars 1983 við hesum viðmerkingum.

»Enn í dag er grind ein týðandi táttur í føroyska húsarhaldinum, eins og hon hevur verið gjøgnum øldir her á landi. Væl eru tíðirnar broyttar frá tí, at grind var ein avgjørdur lívsbjargandi lutur í føði føroyinga, og væl vilja tíðir framyvir áhaldandi broytast.

Men broyttu tíðirnar hava ávirkað, at luttøkan í grindarakstri og at drepa grind, tíverri er vorðin minkandi millum manna, sjálvt um áhugin í dag ikki er minni enn fyrr.

Nú skulu menn leggja lønt arbeiði niður fyri at fara í grind ella fyri at taka grind upp og missa harvið dagløn — ja dagløntir — um farast skal av bygd eftir grind.

Tíverri stendst — av og á — mannskaði bæði undir rakstri ella í drápi, menn kunnu skera seg illa — ja um óhappið er har, ella bátur brotnar — bæði bróta bein ella arm ella fáa annan likamsskaða. Eisini undir upptøku av grind kann slíkt koma fyri, t.d. tá tungir hvalir — oftast í myrkri verða hivaðir upp til uppskeringar ella í bil til flutnings, kann krókur gleppa úr, tog ella wirur slitna og gera mannskaða.

Slíkur skaði er — um eg so má siga — fyri egna rokning, av tí at flestu menn eru ótryggjaðir, og kann sostatt óarbeiðsføri, hent í grind, verða dýrt í mistum forvinningi.

Slík hóttan — risiko — økir ikki um áhugan fyri at fara í grind ella at vera við í upptøkuni.

Tí meti eg, at ein almenn landsumfatandi kollektiv vanlukkutrygging í hesum sambandi var uppá sítt pláss, havandi í huga, at enn í dag hevur ókeypis ella bílig grind munandi týdning í vanliga føroyska húsarhaldinum og loyvi eg mær tí at seta hetta uppskot fram.«

Málið var eftir 1. viðgerð beint í lógarnevndina og kom aftur á tingborð hin 13. mai 1983 við hesum viðmerkingum:

»Eftir uppskotinum skal landsstýrið tekna eina kollektiva vanlukkutrygging fyri persónsskaðar í grind.

Grindaskaði, sum ikki fevnir um persónsskaða, verður goldin við sølu av grindahvali. Í fleiri grindaøkjum verður eingin hvalur seldur fyri skaða, tí kommununrnar hava átikið sær at bera skaðan.

Nevndin heldur, at landsstýrið eigur at fáa Kommunufelagið at kanna, um ikki kommununrnar kunnu átaka sær hesa bygging, eins og flestu kommunur hava átikið sær at rinda fyri annan grindaskaða.«

og fylgjandi uppskot til samtyktar:

»Álagt verður landsstýrinum saman við Kommunufelagnum at kanna, um kommunurnar kunnu átaka sær at tekna eina kollektiva persónstrygging fyri persónar, ið eru í grind.«

Hetta uppskot varð samtykt, men sum framgongur av viðlagda fotoavriti frá Føroya Kommunufelag, so letur hetta seg ikki gera, og tá føroyingar framvegis eta grind og spik, og persónskaði framvegis hendir í grindadrápi ella í samband við upptøku av grind, so loyvi eg mær einaferð enn at seta uppskotið fram í tess upprunaliga líki, minnandi tingið á, at ein slík almenn kollektiv trygging bert kostar tí almenna nakrar fáar hundrað krónur um árið.

1. viðgerð 26. mars. Málið varð beint í lóganevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi:

## Álit

Málið varð lagt fram av Ova Mikkelsen tann 21. mars 1984 og við 1. viðgerð 26. s.m. beint í lóganevndina.

Lóganevndin hevur spurt Føroya Kommunufelag, um kommunurnar kunnu átaka sær at tekna eina tílíka trygging, sum skotið verður upp, og hevur Kommunufelagið í skrivi dagfest 13. december 1983 svarað nevndini soljóðandi:

»Lóganevndin hevur spurt felagið, um kommunurnar kunnu átaka sær at tekna eina trygging, sum umfatar vanlukkur, ið henda undir grindarakstri, grindadrápi og upptøku av grind. Sum prógrund verður sagt, at kommunurnar longu hava átkið sær at rinda fyri annan grindaskaða.

Um so er, at grindin verður býtt javnt millum íbúgvararnar í kommununi, so er einki í vegin fyri at kommunurnar rinda fyri grindaskaða, men um so er, at grindin einans verður býtt millum tey, sum luttaka í grindini, so hevur kommunan ikki heimild at gjalda fyri grindaskaða, uttan so at [illegible] er ikki.

Tá kommunur ikki kunnu tekna tryggingar fyri borgarar í øðrum kommunum, so kunnu tær heldur ikki tekna eina kollektiva trygging, ið umfatar aðrar enn teirra egnu borgarar. Ein tílík trygging kann tá bert vera galdandi, um grindin verður javnt býtt millum íbúgvararnar.

Ein tílík trygging vildi tí givið luttakarunum í grindini eina falska uppfatan av tryggingarviðurskiftunum, tí um grindin bert verður

býtt millum luttakararnar í grindini, so eru teir ikki tryggjaðir.

Um ætlanin kortini er at gera eina lóg, har kommunurnar skulu gjalda, verður hervið heitt á lóganevndina, um at siga felagnum frá.«

Sostatt er einki í vegin fyri, at kommunurnar vilja átaka sær at tekna eina kollektiva trygging fyri borgararnar í kommununi, um grindin verður býtt javnt millum allar borgararnar í kommununi.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Asbjørn Joensen, Agnar Nielsen, Arne Ziskasen, og Jákup Lindenskov) metir málið sum loyst, tá kommunurnar vilja átaka sær at tryggja teirra borgarar móti grindaskaða, um grindin verður býtt javnt millum íbúgvararnar eins og tær nú rinda fyri vanligan grindaskaða. Vísandi til frammanfyri standandi setur meirilutin fram fylgjandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Ett eintak av hesum áliti verður sent kommununum til eftirtektar.

Minnilutin (Petur Reinert) mælir til at samtykkja uppskotið frá Ova Mikkelsen.

2. viðgerð 27. apríl. Atkvøðugreiðsla 1. mai. § 1 fall við 10-0. Uppskotið til samtyktar varð samtykt við 23-0 atkvøðum.

# 92. Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

Ár 1984, fríggjadagin 23. mars legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.**

§ **1.** Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 3 stk. 2 verður »kr. 4.000« broytt til »kr. 5.000«. »Kr. 9.500« verður broytt til »kr. 10.500« og »kr. 6.700« verður broytt til »kr. 7.700«.

2) Sum uppískoyti til stk. 2 verður sett:
»Frá og við 1. apríl 1984 verður persónsfrádrátturin prítalsviðgjørdur við prístalinum 1. apríl 1984 sett til 100«.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.**

§ **1.** I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om udskrivning af skat til landskassen foretages følgende ændringer:

1) I § 3 stk. 2 ændres »kr. 4.000« til »kr. 5.000«. »Kr. 9.500« ændres til »kr. 10.500« og »kr. 6.700« ændres til »kr. 7.700«.

2) Følgende tilføjes til stk. 2:
»Fra og med 1. april 1984 pristalsbehandles personsfradraget med pristallet 1. april 1984 sat til 100«.

§ 2. Henda lóg fær gildi frá og við inntøkuárinum 1984.

§ 2. Denne lov træder i kraft fra og med indtægståret 1984.

**Viðmerkingar:**
Gongdin tey seinastu trý árini hevur gjørt tað munandi dýrari og tyngri hjá fólki at liva. Serliga eru tað fólk við teimum lægru inntøkunum og pensionistarnir sum eru hart rakt.

Meðan vit í sjeytiárunum høvdu ein javnan reallønarvøkstur, so hevur talan verið um beinleiðis niðurgongd í relallønini hesi seinastu fýra árini. Løntakarafeløgini hava víst á, at varð reallønin sett ájavnt við 100 í 1970, so var hon komin uppá 125 í 1979, meðan hon 1. januar 1983 var komin niður aftur á 102. Síðani tá hevur samgongan sett prístalið til 100. Hetta, saman við gongdini annars, hevur ført til eina enn størri niðurgongd í reallønini.

Nevnast kann eisini, at í september 1981 vórðu tollgjøldini hækkað í so stóran mun, at hetta tá varð mett at geva landskassanum eina meirinntøku uppá umleið 50 mió. kr. um árið. Í hesum árinum kosta hesar tollhækkingar helst brúkarunum einar 75 til 100 mió. kr. Somuleiðis kann verða nevnt, at skattastigin ongantíð varð javnførdur í tíðarskeiðinum frá mars 1980 til august 1983. Persónsfrádrátturin varð heldur ongantíð javnførdur í hesum tíðarskeiði. Úrslitið av hesum varð, at skatturin í hesum tíðarskeiði hækkaði av sær sjálvum hvørja ferð løntirnar og pensiónirnar fóru upp orsakað av prístalsbroytingum.

Í august 1983 fekk samgongan umsíðir tikið seg saman. Uppskot kom á ting um at javnføra skattastigan og persónsfrádráttin. Broytingarnar sum vórðu gjørdar í august 1983 fáa gildi frá komandi skattaári. T. v.s. at hesar javnføringar fyrst skuldu umfata tíðarskeiðið frá 1. apríl 1980 til 1. apríl 1984 og síðani skuldu umfata ella taka hædd fyri at vit nú fara yvir til samtíðarskatt. Javnføringarnar vóru ikki nóg stórar til at umfata alt hetta. Javnaðarflokkurin loyvir sær tí at koma við uppskoti um at hækka allar persónsfrádráttirnar við 1.000 kr.

Fyri fólkapensionistar fær henda broytingin tann týdning, at hesir aftur gerast heilt skattafrítir. Broytingarnar, sum verða gjørdar í skattalógini í 1978, førdu við sær, at fólkapensionistar ongan skatt fingu. Men við tað at pensiónirnar hækkaðu við prístalinum komu pensionistar skjótt at gjalda skatt aftur. Hetta uppskotið sleppur fólkapensionustum undan skatti og við tað at uppskotið eisini umfatar eina prístalsregulering av persónsfrádráttunum skuldu tolka

pensionistar hervið sloppið undan skatti fyri framtíðina.

Tað, at allir persónsfrádráttirnir verða hækkaðir við 1.000 kr., verður mett at kosta landskassanum einar 20 til 25 mió. kr. Í álitinum til fíggjarlógina fyri 1984/85 vil javnaðarflokkurin ávísa eina peningaupphædd sum samsvarar hesum meirkostnað fyri landskassan.

1. viðgerð 28. mars. Málið varð beint í skattanevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð framlagt av Javnaðarflokkinum tann 23. mars 1984 og undir 1. viðgerð tann 28. í s.m. beint í skattanevndina.

Skotið verður upp at hækka og prísregulera allar persónsfrádráttir.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eli Nolsøe, Jógvan Sundstein og Hilmar Kass) metir, at tað er skeivt at gera broytingar í skattalógini longu nú, áðrenn vit vita, hvørja ávirkan nýggja skattaskipanin fær eitt nú á fólkapensjónistar, og setir tí einki uppskot fram.

Minnilutin (Vilhelm Johannesen og Finnbogi Isaksen) tekur undir við uppskoti Javnaðarfloksins um at hækka allar persónsfrádráttirnar við 1.000 kr. og at prístalsregulera hesar frádráttir.

Minnilutin loyvir sær at vísa á, at skattastigin og persónsfrádráttirnir ongantíð vórðu javnførdir frá mars 1980 til august 1983, og at javnføringin, sum varð gjørd tá, ikki var nóg stór. Tá skattastigin og persónsfrádráttirnir vórðu javnførdir í august 1983, skuldu vit fyrst taka hædd fyri lønarvøkstrinum orsakað av prístalinum seinastu fýra árini og síðani skuldu vit taka hædd fyri umleggingini til samtíðarskatt. Minnilutin heldur ikki, at javnføringin í august 1983 var nóg stór til at umfata alt hetta.

Eisini loyvir minnilutin sær at vísa á, at førdi politikkurin seinastu árini hevur skert keypiorkuna hjá fólkinum heilt óvanliga nógv. Við eykatolli, einum øktum skattatrýsti, hækkaðum útvarpsgjaldi, hækkaðum sjónvarpsgjaldi, hækkaðum telefongjøldum og stórari niðurgongd í reallønini er tað vorðið nógv dýrari og tyngri hjá pensjónistum og teimum lægst løntu at liva. Um persónsfrádráttirnir verða hækkaðir við 1.000 kr., so vildi hetta, um ikki í fullan mun, so í ávísan mun givið pensjónistunum og teimum lægst løntu vakað aftur av tí, sum tikið er frá teimum.

Umboðini fyri Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin fara eisini at minna á, at løgtingið í 1978 tók undir við tí meginreglu, at allar fólkapensjónir skulu sleppa undan skatti. Tá varð persónsfrádrátturin hækkaður so munandi, at pensjónistar ikki fingu skatt. Men við tað at pensjónirnar síðani eru hækkaðar, so eru pensjónistar aftur komnir undir skatt. Um uppskotið frá Javnaðarflokkinum verður samtykt, sleppa pensjónistar aftur undan skatti, og við tað at uppskotið eisini umfatar prístalsregulering av persónsfrádráttunum, skuldi pensjónistar harvið sloppið undan skatti í framtíðini.

Minnilutin er greiður yvir, at stórt avlop verður á fíggjarlógini, og heldur tað verða rætt, at pensjónistar og tey lægst løntu fáa ein part av hesum avlopi. Minnilutin mælir tí tinginum til at samtykkja uppskotið frá javnaðarflokkinum og harvið geva ein skattalætta upp á 25 mió. kr.

2. viðgerð 7. mai. Atkvøðugreiðslan 8. mai. § 1 fall við 14 ja-atkvøðum, 16 atkvøddu ikki, 2 vóru burturstaddir. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

| | |
|---|---|
| Ja atkvøddu: | Juul Jacobsen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Beck, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Ingrid Sondum, Hans J. Debes, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen. |
| Atkvøddu ikki: | Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Fredrik Olsen, Arne Ziskasen, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Edmund í Garði, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein. |
| Burturstaddir: | Hilmar Kass og Adolf V. Hansen. |

# 93. Uppskot til samtyktar viðvíkjandi partroling.

Ár 1984, fríggjadagin 23. mars legði Ove Mikkelsen, løgtingsmaður vegna Tjóveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at áleggja landsstýrinum at kanna:

1) Hvat árin og ávirkan sum heild partroling hevur á botnfiskastovnin á landleiðini.
2) Kanna um tað er so, at mesti parturin av tí sokallaða »reyðupsa« stavar frá bátum, sum nýta partroling.
3) Hví hesin reiðskapur er bannaður í Íslandi, Noregi og í øðrum londum.
4) Úrslit av hesi kanning verða at leggja fyri tingið sum skjótast.

**Viðmerkingar:**

Nú ásannað er, at nakað effektivt má gerast fyri at verja okkara botnstovnar ímóti tí alsamt vaksandi veiðutrýsti og ovurfisking, eigur at verða kannað, hvat árin hesin veiðuháttur hevur á botnfiskastovnarnar sum heild, eins og hví lond sum Ísland, Noreg og onnur hava bannað nýtslu av partroling eftir botnfiski.

Sum kunnugt er partroling ein sera effektivur reiðskapur, lutvís bíligari og orkusparandi v.m. Men spurningurin er um vit hava ráð til at loyva henda veiðuhátt eftir okkara botnfiski, ella um partroling eigur at verða loyvd á øllum økjum.

Við teimum sera longu breiðlunum og umleið 1/2 fjórðing millum bátarnar, verður nærum alt kykt rikið í trolið, sum eisini er munandi hægri enn vanligt trol.

Eisini eigur at verða kannað, um tað er so sum Førova Fiska-

søla og menn vilja vera við, at 99% av øllum »reyð-upsa« stavar frá partrolarunum.

Sum tað sæst, so er orsøkin til »reyð-upsa« tann, at tá posin er ov fullur av upsa, kemur hann ov knapt upp, og verður fiskurin blóðsprongdur innanífrá, t.v.s. at blóð — ja heilar sveitalivrar — verða trýstar saman undir skræðuni, og fiskurin bráðdoyr, soleiðis at blóðging onga ávirkan hevur á slíkan fisk. At upsi er blóðsprongdur — reyður — sæst ikki fyrr enn fiskurin er skorin og skrædlaður, og kann tí eftir vanligari góðskumeting vera 1. floks A-fiskur.

»Reyð-upsi« sigst at hava verið orsøk til ovurhonds stórar reklamatiónir, eins og orsøk til at prísurin á vanligum upsa verður trýstur niður, og hevur hann verið orsøk til at trupult hevur verið at selja upsa sum heild.

Tjóðveldisflokkurin metir tí vera rætt, at hetta og annað viðvíkjandi hesum veiðuhátti verður gjølla kannað sum skjótast og at úrslitið verður gjørt tinginum kunnugt.

1. viðgerð 27. mars 1984. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Uppskotið er lagt fram av Tjóðveldisflokkinum 23. mars 1984 og við 1. viðgerð 27. í s.m. beint í fiskivinnunevndina.

Uppskotið er í 4 pørtum. Nevndin ger vart við, at pkt. 3 ikki er samsvarandi verunleikanum, við tað at partroling ikki er forboðin í Noregi ella Íslandi.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Juul Jacobsen, Øssur Dam Jacobsen, [illegible] Tórálvur Mohr Osen og Jógvan I. Osen) [illegible]

Minnilutin (Hans M. Joensen) mælir til at samtykkja [illegible] 2 og 4.

2. viðgerð 7. mai. Pkt. 1 fall við 9-0 og pkt. 2 og 4 fullu við 6-0 atkvøðum.

# 94. Veðhald fyri láni til Menningargrunnin.

Ár 1984, fríggjadagin 23. mars legði Pauli Ellefsen, løgmaður, vegna landsstýrið, fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um veðhald fyri láni til Menningargrunn Ídnaðarins.**

**§ 1.** Menningargrunni Ídnaðarins verður loyvt umframt hansara árligu lániheimild sambært § 6 í løgtingslóg nr. 37 frá 26. juni 1973 sum broytt við løgtingslóg nr. 89 frá 18. september 1980 at upptaka lán við landskassaveðhaldi uppá 40 mió. kr.

**§ 2.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om garanti for lån til Menningargrunn Ídnaðarins.**

**§ 1.** Menningargrunnur Ídnaðarins får tilladelse til, udover den årlige lånehjemmel i henhold til § 6 i lagtingslov nr. 37 af 26. juni 1973, som ændret ved lagtingslov nr. 89 af 18. september 1980 at optage lån med garanti fra landskassen på 40 mio. kr.

**§ 2.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Virksemi Menningargrunsins er støðugt vaksandi, einahelst av tí útbygging innan fiskaaling, sum er farin fram seinastu árini. Eisini er tørvurin á rakstrarlánum/veðhaldum støðugt vaksandi, tá talan er um stovnsetan av nýggjum virkjum.

Sambært § 6 í lógini um Menningargrunn, kann grunnurin taka lán við landskassaveðhaldi uppá 5 mió. kr. og sambært uppskoti til fíggjarløgtingslóg 1984/85 fær grunnurin 9 mió. kr. í studningi.

Teir fiskaalarar, sum hava fingið figging í 1983/84, verða figgjaðir við o.u. 25 mió. kr. í 1984/85.

Til annan ídnað verður mett 35 mió. kr., ella tilsamans 60 mió.

Til rentur og avdrátt av verandi lánum, sum Menningargrunnurin hevur upptikið, og rakstur, er tørvur á umleið 10 mió. kr.

Grunnurin metir inntøkurnar fyri 1984/85 til 30 mió. kr., býtt sundur uppá áður nevndu 9 mió. kr. eftir figgjarlógini + inngjalding av rentum og avdráttum.

Figgjartørvurin fyri 1984/85 verður umleið 40 mió. kr.

Til samanetingar kann nevnast, at 54,6 mió. kr. vórðu játtaðar úr grunninum í figgjarárinum 1982/83.

1. viðgerð 27. mars 1984. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 3. apríl 1984 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 23. mars 1984 og undir 1. viðgerð tann 27. mars beint í figgjarnevndina.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 6. apríl 1984. § 1 varð samtykt við 25-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 26-0 at kvøðum.

3. viðgerð 10. apríl 1984. Málið endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1212-14-1. Lóg nr. 37 frá 3. mai 1984.

# 95. Løgtingslóg um hvalaveiðu.

Ár 1984, friggjadagin 23. mars legði Pauli Ellefsen, løgmaður, vegna landsstýrið, fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um hvalaveiðu.**

§ 1. Á landleiðini er tað forboðið við skipum, sum hava heimstað og eru skrásett í fremmandum landi og fremmandum ríkisborgarum at røkja viðmuliga hvalaveiðu yvirhøvur, herundir at fáast við slíkt, ið stendur í samband við hvalaveiðu, so sum umskiping av veiðu, virking, pakking ella onnur handfaring av hvali ella hvalaúrdrátti, umskiping av útgerð ella ankring við tí í hyggju at taka lut í umskiping av hvali ella hvalaúrdrátti ella at taka inn útgerð.

*2. stk.* Landsstýrinum er heimilað at gera undantak frá forboðnum í 1. stk. til fremmandar ríkisborgarar, búsettir í Føroyum.

§ 2. Veiðifør, sum hava heimstað og eru skrásett í fremmi-

**lagtingslov om hvalfangst.**

§ 1. På fiskeriterritoriet er det forbudt fra skibe hjemmehørende og registreret i fremmed stat og fremmede statsborgere at drive nogen som helst erhvervsmæssig hvalfangst, herunder at foretage sådanne handlinger, der står i forbindelse med hvalfangst, såsom omladning af fangst, tilvirkning, pakning eller anden behandling af hval eller hvalprodukter, omladning og udrustning eller ankring med henblik på deltagelse i omladning af hval eller hvalprodukter eller indtagelse af udrustning.

*Stk. 2.* Landsstyret bemyndiges til at meddele dispensation fra forbudet i stk. 1 til fremmede statsborgere, bosat på Færøerne.

§ 2. Fangstskibe hjemmehørende og registreret i en fremmed stat

andum landi, skulu á landleiðini, eisini í havn, tá ið havarí er undantikið, hava allan hvalaveiðureiðskap burturstúgvaðan, sum vanligt er.

§ 3. At skipa fyri veiðuni av hvali, ið ikki er undir friðing, við skipum, sum hava heimstað og eru skrásett í kongaríkinum, og við bátum, er landsstýrinum saman við fiskivinnunevnd løgtingsins heimilað við kunngerð at áseta reglur um, hvussu veiða skal fremjast á landleiðini, tað er m.a. reglur um minstamát, friðað økir, friðingartíðir, veiðureiðskap og nýtslu teirra, veiðuhættir, avmarking av veiðunøgd og veiðuorku.

§ 4. Allur hvalur (Cetacea) er friðaður fyri veiðu uttan mun til veiðuhátt. Hesi hvalasløg eru tó undantikin friðing:

skal på fiskeriterritoriet, også i havn, undtagen i tilfælde av havari, have alle hvalfangstredskaber stuvet til side, som sædvanligt er.

§ 3. Med det formål at regulere fangsten af hval, der ikke er under fredning, fra skibe, hjemmehørende og registreret i kongeriget, og fra både, bemyndiges landsstyret sammen med lagtingets fiskeriudvalg til ved bekendtgørelse at fastsætte regler om, hvordan fangsten skal udøves på fiskeriterritoriet, d.v.s. bl. a. regler om mindstemål, fredede områder, fredningstider, fangstredskaber og deres brug, fangstmetoder, begrænsning af fangstmængde og fangstindsats.

§ 4. Alle hvaler (Cetacea) er fredet for fangst, uanset fangstmåde. Følgende hvalarter er dog undtagne fredning:

| | | |
|---|---|---|
| Bógvituhvalur (mastrahvalur) | Orcinus orca | Spækhugger |
| Døglingur | Hyperoodonampullatus | Døgling |
| Grindahvalur | Globicephala melaena | Grindehval |
| Hvessingur | Tursiops truncatus | Øresvin |
| Kjafthvítur springari | Lagernorhynchus albirostris | Hvidnæse |
| Nísa | Phocaena phocaena | Marsvin |
| Skjórutur springari | Lagernorhynchus acutis | Hvidskæving |

*2. stk.* Landsstýrinum er í serstøkum føri saman við fiski-

*Stk. 2.* Landsstyret bemyndiges til sammen med lagtingets fiske-

vinnunevnd løgtingsins heimilað at undantaka onnur ávís hvalasløg frá friðingini.

**§ 5.** Landsstýrinum er heimilað at gera avtalu við fremmand lond um hvalaveiðu á heimasjógvi teirra ella á víðum havi við skipum, sum hava heimstað og eru skrásett í Føroyum. Treyt fyri, at avtalan er gildug, er, at avtalan er góðkend av løgtinginum, tó kann marknaðarnevnd løgtingsins, um løgtingið ikki er saman, geva fyribils góðkenning av avtaluni.

*2. stk.* Viðvíkjandi føroyskum skipum á donskum ella grønlendskum heimasjógvi eigur landsstýrið somu treytaðu heimild sum eftir 1. stk. at gera avtalu við ríkisstýrið ella grønlendskar myndugleikar.

*3. stk.* At skipa fyri veiðuni eftir 1. og 2. stk. er landsstýrinum í samráð við løgtingsins marknaðarnevnd heimilað við kunngerð at seta reglur um, hvussu veiðan skal fremjast, jbr. § 3.

riudvalg i særlige tilfælde at undtage fra fredning visse andre hvalarter.

**§ 5.** Landsstyret bemyndiges til at indgå aftale med fremmede stater om hvalfangst på disses fangstterritorier eller på det åbne hav med skibe hjemmehørende og registreret på Færøerne. Det er en betingelse for aftalens gyldighed, at aftalen er godkendt af lagtinget, dog kan lagtingets markedsudvalg, såfremt lagtinget ikke er samlet, give en foreløbig godkendelse af aftalen.

*Stk. 2.* For så vidt færøske skibe på dansk eller grønlandsk fangstterritorium angår, har landsstyret den samme betingede bemyndigelse som efter stk. 1 at afslutte aftale med regeringen eller grønlandske myndigheder.

*Stk. 3.* Med det formål at regulere fangsten i henhold til stk. 1 og 2 bemyndiges landsstyret til efter samråd med lagtingets markedsudvalg ved bekendtgørelse at fastsætte regler om, hvordan fangsten kan udøves, jfr. § 3.

**§ 6.** Brot móti reglunum í § 1, tá ið talan er um ólógliga veiðu, koma undir bót og herafturat koma øll veiðuamboð so sum kanónir, lóður, línur o.t. og fongur undir konfiskatión. Skipið kann eisini heftast til rindingar

**§ 6.** Overtrædelse af bestemmelserne i § 1 for så vidt angår ulovlig fangst straffes med bøde, hvorhos samtlige fangstredskaber, herunder kanoner, ladning, liner o.l. og fangst bliver at konfiskere. Skibet kan beslaglægges

av bót og kostnað.
*2. stk.* Brot móti forboðnum í § 1 um at fáast við slíkt, ið stendur í samband við veiðu og boðnum eftir § 2 koma undir bót, herafturat kann skip, fongur og allur reiðskapur heftast til rindingar av bót og kostnað.
*3. stk.* Brot móti kunngerðum landsstýrisins eftir §§ 3 og 5, 3. stk. koma undir bót og herafturat kann allur veiðureiðskapur, so sum kanónir, lóður, línur o.t. og fongur koma undir konfiskatión. Skipið kann eisini heftast til rindingar av bót og kostnað.

§ 7. Hendan lóg kemur beinanvegin í gildi. Samstundis fer úr gildi lóg frá 29. december 1857 »om grindefangsten på Færøerne«, lóg nr. 117 frá 15. mars 1939 »om hvalfangst«, kongalig fyriskipan nr. 382 frá 12. juli 1974 »om hvalfangst« og løgtingslóg nr. 31 frá 14. apríl 1977 um bann móti skjóting av grindahvali á landleiðini.
*2. stk.* Landsstýrið fær heimild til við kunngerð at seta løgtingslóg nr. 8 frá 3. januar 1950 um døglingsbýti úr gildi.
*3. stk.* Grindareglugerðin nr. 21 frá 17. mai 1955 við seinni broytingum verður verandi í gildi til kunngerð er komin í hennara stað.

til dækning af bøde og omkostninger.
*Stk. 2.* Overtrædelse af forbudet i § 1 mod at foretage accessoriske handlinger og påbudet i § 2 straffes med bøde, hvorhos skib, fangst og samtlige redskaber kan beslaglægges til dækning af bøde og omkostninger.
*Stk. 3.* Overtrædelse af landsstyrets bekendtgørelser i henhold til §§ 3 og 5, stk. 3, straffes med bøde, hvorhos samtlige fangstredskaber, herunder kanoner, ladning, liner o.lign. og fangst kan konfiskeres. Skibet kan beslaglægges til dækning af bøde og omkostninger.

§ 7. Denne lov træder i kraft straks. Samtidig ophæves lov af 29. december 1857 om grindefangsten på Færøerne, lov nr. 117 af 15. marts 1939 om hvalfangst, kongelig anordning nr. 382 af 12. juli 1974 om hvalfangst og lagtingslov nr. 31 af 14. april 1977 om forbud mod skydning af grindehval indenfor søterritoriet.
*Stk. 2.* Landsstyret bemyndiges til ved bekendtgørelse at sætte lagtingslov nr. 8 af 3. januar 1950 om fordeling af døglingefangst ud af kraft.
*Stk. 3.* Grindareglugerðin nr. 21 af 17. maj 1955 med senere ændringer forbliver i kraft, til en bekendtgørelse erstatter denne.

**Viðmerkingar:**
Lógaruppskotið verður lagt fram at greiða tvídrátt, ið hevur tikið seg upp millum landsstýrið og ríkisstýrið, um hvør av hesum, ið hevur heimildina at regulera stórhvalaveiðuna við Føroyar. Eitt annað endamál, er at skapa hóskiligari og smidligari reglur fyri hvalaveiðu yvirhøvur, eisini veiðu av smáhvali sum t.d. grindahvali.

Í 1948 samtykti heimastýrið at yvirtaka lista A málsøkið »jakt og friðing av djórum á territoriinum«. Galdandi var lóg nr. 117 frá 15. mars 1939 »om hvalfangst«. Tann myndugleikin, sum eftir lógini var lagdur til ávísan ráðharra, varð samstundis við yvirtøkuni og uttan lógarbroyting fluttur til landsstýrið eins og í øðrum yvirtøkum.

Galdandi reglur nú eru, umframt lógin, kongalig fyriskipan nr. 382 frá 12. juli 1974, sum heimastýrið hevur góðkent at seta í gildi í Føroyum. Eftir fyriskipanini hevur fiskimálaráðharrin (nú grønlandsmálaráðharrin) heimild at regulera stórhvalaveiðuna. Orsøkin til at heimastýrið hevur góðkent hesa skipan, fyribils kundi hon bert vera, síðani málið er yvirtikið, er helst, at Føroyar tá høvdu 12 fjórðinga veiðumark, og mestiparturin av stórhvalaveiðuni var uttan fyri hetta mark, tað var uttanhanda við tveimum myndugleikum, einum innanfyri og einum uttanfyri veiðumark.

Síðani 1978 hava Føroyar havt 200 fjórðinga veiðumark, umstøðurnar eru tí øðrvísi nú. Heimastýrið eigur tí greitt at siga frá, at reguleringsmyndugleikin er hjá heimastýrinum og ikki longur fyribils hjá ríkismyndugleikunum.

Tær lógarreglur, ið nevndar eru, eru um stórhval og ikki um grindahval og onnur smærri hvalasløg. Um hesi hvalasløg er galdandi lóg frá 29.december 1857 »om grindefangsten på Færøerne«, grindareglugerin nr. 21 frá 17. mai 1955, løgtingslóg nr. 8 frá 3. januar 1950 um døglingsbýti og løgtingslóg nr. 31 frá 14. apríl 1977 um bann móti skjóting av grindahvali á landleiðini.

Lógaruppskotið fevnir bæði um stórhval og smáhval. Tað er skipað á sama hátt sum løgtingslógirnar nr. 8 frá 29 mars 1978 um fiskiveiðu á landleiðini og nr. 55 frá 29. august 1978 um regulering av føroyskum fiskiskapi uttanfyri landleiðina. Eisini prinsippið í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m., at alt tað, sum ikki beinleiðis er loyvt at veiða, er friðað, er tikið við.

Tær ymsu reguleringarnar av stórhvalaveiðu eru grundaðar á tilmæli til limirnar í millumlanda hvalanevndini (international Whaling Commission). Kongaríkið Danmark er limur í hesi nevnd, Føroyar ikki undantiknar.

*Viðmerkingar til greinirnar:*
*ad § 1:* Svarar til § 2 í løgtingslóg nr. 8/1978, bert er hvalur settur inn í staðin fyri fiskur.

*ad § 2:* Svarar til § 3 í 11. nr. 8/1978, jbr. annars ad § 1.

*ad § 3:* Svarar til § 4 í 11. nr. 8/1978, sum hon er broytt við 11. nr. 54/1982, jbr. annars ad § 1.

*ad § 4:* Eftir fuglaveiðulógini, 11. nr. 27/1954 er grundreglan, at allur fuglur er friðaður fyri veiðu bert við nøkrum fáum undantøkum, ið øll eru nevnd í lógini. Annar fuglur kann tí bert verða undantikin friðingini við lógarbroyting.

Í uppskotinum er grundreglan hin sama, at allur hvalur er friðaður fyri veiðu, tó við nøkrum undantøkum, sum eisini eru nevnd í lógini. Undantøkini eru smáhvalasløg, sum javnan, eitt nú grindahvalur og døglingur, ella bert av og á verða veidd.

Í 2. stk. er tó tann munurin frá fuglaveiðulógini, at tað ikki krevst lógarbroyting til, at onnur hvalasløg verða undantikin friðing. Landsstýrið saman við fiskivinnunevnd løgtingsins fær heimild at gera undantak. Grundgevingin fyri muninum er, at tað kunnu vera umstøður, ið gera tað forsvarligt at veiða ávís onnur hvalasløg og stundir ikki eru at fáa málið til viðgerðar í løgtinginum.

*ad § 5:* Svarar til §§ 1 og 2 í 11. nr. 55/78, jbr. annars ad § 1.

*ad § 6:* Svarar til § 5 í 11. nr. 8/78 og § 3 í 11. nr. 55/78, jbr. annars ad § 1.

*ad § 7:* Verður løgtingslógin um døglingsbýti avtikin samstundis við, at henda lóg verður sett í gildi, eru ongar reglur. Skotið er tí upp, at landsstýrið fær heimild til at kunngera, nær lógin fer úr gildi, soleiðis at aðrar reglur um døglingsbýti tá eru gjørdar í kunngerð.

Heldur ikki ber til, at grindareglugerðin fer úr gildi, áðrenn aðrar reglur um grind eru gjørdar.

1. viðgerð 27. mars 1984. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi:

**Álit**

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 23. mars 1984 og við 1. viðgerð 27. í s.m. beint í fiskivinnunevndina.

Ein samd fiskivinnunevnd tekur undir við uppskotinum og mælir til at samtykkja tað.

2. viðgerð 7. mai. § 1 varð samtykt við 30-0, §§ 2-6 samtyktar við 31-0, § 7 uttan atkvøðugreiðslu. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 31-0 atkvøðum.

3. viðgerð 8. mai. Málið endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1611-11-4. Lóg nr. 57 frá 5. juni 1984.

---

# 96. Størri ávirkan hjá løgtingi og landsstýri á SEV.

Ár 1984, fríggjadagin 23. mars legði Finnbogi Isaksen, løgtingsmaður fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum beinanvegin og ikki seinni enn 1. juni 1984 at gera hesar broytingar í kunngerð nr. 49 frá 4. oktober

1985 um góðkenning av viðtøkum hjá interkommunala elektrisitetsfelagsskapinum S.E.V.:

1) Í 3. grein verður sett sum nýtt 2. pkt. b):
»Løgtingið velur 7 limir í umboðsmannanevndina, búsitandi hvør í sínum valdømi.«
2) Í 3. grein verður sett sum nýtt 3, pkt. b):
»Hvør av teimum løgtingsvaldu limunum hevur so nógvar atkvøður, sum svara til 1/7 av teimum samlaðu atkvøðunum.«
3) Í 3. grein, 6. stk. verður sett sum nýtt pkt. b):
»Tá ið løgtingið velur umboðsmann, velur tað samstundis varamann, ið tekur við, tá umboðsmanninum lógliga berst frá.«
4) Í 4. grein, 1. stk. verður orðað soleiðis:
»Til at hava yvirstjórn í felagsins viðurskiftum verður valt eitt 14 manna stýri«.
5) Í 4. grein, 2. stk. verða orðini »Stýrið verður valt« broytt til:
»Teir 7 kommunuvaldu limirnir í stýrinum verða«.
6) Í 4. grein, 2. stk. verður sett sum nýtt pkt. b):
»Landsstýrið velur hinar 7 nevndarlimirnar, búsitandi hvør í sínum valdømi.«
7) Í 4. grein, 3. stk. verður sett sum nýtt pkt. b):
»Tá ið landsstýrið velur stýrislim, velur tað eisini varamann, ið tekur við, tá stýrisliminum lógliga berst frá.«
8) Í 4. grein, 7. stk. verður talið »fýra« broytt til »átta«.
9) Í 4. grein, 8. stk. verður talið »3« broytt til »6«.

**Viðmerkingar:**

Interkommunali felagsskapurin SEV fevndi upprunaliga bert um Vágarnar, Streymoynna og Eysturoynna. Seinni eru allar hinar kommununrnar í landinum komnar uppí.

Landsstýrið hevur eitt ávíst eftirlit við felagsskapinum.

Eftir ta stóru vatnorkuútbyggingina í Vestmanna, hevur felagsskapurin mestsum einans bygt út motorverksorkuna. Nú hava tó í fleiri ár ligið ætlanir frammi um eina umfatandi útbygging av vatnorkuni í Vágum, Norðstreymoy og Eysturoynni.

Henda ætlan, ið man fara at kosta eina miljard ella meira, verður hon sett í verk, er so umfatandi, at tað kann ikki haldast vera rætt longur, at løgtingsins partur í slíkum projekti bert skal vera at veðhalda fyri neyðugum lánum.

Skotið verður tí upp, at landsstýrið skal broyta kunngerðin

leiðsluna av SEV soleiðis, at løgtingið skal velja 7 limir í umboðsnevndina, ið skulu hava líka nógvar atkvøður tilsamans sum allir hinir limirnir, og at landsstýrið skal velja 7 limir í stýrið, ið sjálvandi skulu hava líka nógvar atkvøður sum teir sjey kommunuvaldu limirnir.

Verður henda skipan sett í verk, hava kommununrnar øðrumegin og løgtingið og landsstýrið hinumegin eins stóra ávirkan á felagið og útbyggingar tess.

1. viðgerð 28. mars 1984. Málið varð beint í lóganevndina, sum 8. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð framlagt av Finnboga Isaksen, løgtingsmanni, tann 23. mars 1984 og við 1. viðgerð tann 28. s.m. beint í lóganevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Eftir uppskotinum verður álagt landsstýrinum at broyta viðtøkurnar fyri SEV soleiðis, at løgtingið fær limir í umboðsráðið við somu atkvøðuvekt sum teir kommunuvaldu og landsstýrið limir í stýrið eisini við somu atkvøðuvekt sum teir kommunalt valdu og týðir hetta, at landið í verunleikanum yvirtekur leiðsluna av SEV, meðan kommununrnar framvegis koma at hava fíggjarligu ábyrgdina.

Viðtøkurnar fyri SEV eru viðtiknar av umboðsráðnum fyri SEV og staðfestar av landsstýrinum, t.v.s. at tær ikki kunnu broytast uttan landsstýrisins góðkenning. Hin vegin kann landsstýrið ikki sum skotið verður upp einsíðugt broyta viðtøkurnar fyri SEV.

Nevndin heldur tó, at løgtingið og landsstýrið eiga at hava betri innlit við SEV, meðan landið veðheldur fyri týðandi lánsupphæddum.

Ein meiriluti (Asbjørn Joensen, Agnar Nielsen, Øssur Dam Jacobsen og Jákup Lindemskov) setir fram fylgjandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at tingast við SEV um broyting av viðtøkunum soleiðis, at løgtingið og landsstýrið fáa observatør í ávika-

vist umboðsráðið og stýrið, meðan elfelagið hevur lán við landskassaábyrgd.

Minnilutin (Petur Reinert) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá Finnboga Isaksen.

2. viðgerð 8. mai. Uppskotið til samtyktar frá lóganevndini samtykt við 17-0 og uppskotið frá Finnboga Isaksen fall við 9-0 atkvøðum.

---

# 97. Loyvi at veiða lunda, æðu og skarv í eina viku á sumri.

Ár 1984, fríggjadagin 23. mars legði Finnbogi Isaksen, løgtingsmaður fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.**

§ 1. Í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m. við seinni broytingum verður í 17. grein, 2. stk. skoytt uppí:

»e) Í eina viku á sumri frá ..... til .....: Lunda, æðu og skarv.«

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om fuglefangst m.m.**

§ 1. I lagtingslov nr. 27 af 9. september 1954 om fuglefangst m.m. med senere ændringer tilføjes i § 17, stk. 2:

»e) I en uge om sommeren fra ..... til .....: lunde, ederfugl og skarv.«

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar.**

Í Føroyum hava vit eina lóg um fugl, sum er strangari enn í flestum øðrum londum. Aðrastaðni er vanliga loyvt at veiða allan fugl uttan tey fuglasløg, sum tað sambært lóg er beinleiðis forboðið at veiða. Í Føroyum er tað harafturímóti soleiðis, at allur fuglur er friðaður uttan tey fuglasløg, sum tað sambært lóg beinleiðis er loyvt at veiða.

Í 17. grein í fuglalógini er ásett í 1. stk., at »uppi á landi yvirhøvur, eisini á vøtnum, á firðum, víkum og sundum og á sjónum yvirhøvur út at sjómarkinum er allur fuglur friðaður móti skjóting og veiðu«.

Síðani verður ásett, at tað er loyvt at skjóta og annars veiða kráku, ravn, kjógva, skúgv, lomviga, álku, havhest, súlu og øll másasløg. Hetta er ásett í pkt. a) í lógargreinini.

Í b) er ásett, at tað er loyvt at skjóta og veiða lunda um veturin.

Í c) eru álka og lomviga friðað í eitt áramál.

Fyri nøkrum árum síðani varð skarvurin friðaður, tí hildið varð, at stovnurin var nógv minkaður. Síðani er stovnurin komin so væl fyri seg aftur, at tað yðjur av skarvi við strendurnar.

Eisini eru menn yvirhøvur av teirri áskoðan, at nógvur lundi og nógv æða er til.

Uppskotsstillarin heldur, at væl eigur at verða farið um fuglin, bæði á landi og sjógvi, men at hann eigur ikki at vera friðaður fyri friðingina skyld.

Tá so nógv er til av lunda, æðu og skarvi eigur tað eftir uppskotsstillarans hugsan at vera loyvt at skjóta og veiða sær eitt kók av hesum fuglasløgum í nakrar dagar á sumri.

Skotið verður tí upp, at tað verður loyvt at skjóta hesi trý fuglasløgini í eina viku á sumri. Eingin tíðarfesting er sett í lógaruppskotið, tí tað verður mett rættari, at nevndin, sum fær uppskotið til viðgerðar, fyrst ráðførir seg við fuglafrøðingar og fuglamenn um best hóskandi tíðarskeið.

1. viðgerð 27. mars 1984. Málið varð beint í lóganevndina, sum 27. apríl 1984 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð framlagt av Finnboga Isaksen tann 25. mars 1984 og við 1. viðgerð tann 27. í s.m. beint í lóganevndina.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin tosað við Doretu Block Danielsen frá Náttúrugripasavninum og Andrias Reinert frá Fiskirannsóknarstovuni.

Tey førdu fram, at ein ikki eigur at veiða fuglin, meðan hann hevur ungar, og annars er hann heldur ikki so nógv verdur at veiða hesa tíðina.

Skarvur er best egnaður at veiða í august mánaði og æða ikki fyrr enn aftan á 1. oktober. Nógv er til av æðu, og einasta skaða hon ger, er at hon etur nógvan krækling. Skarvi er eisini nógv til av, umframt at stórt tal av fremmandum skarvi vísir seg her ávísar árstíðir. Hann etur rættiliga nógv av seiðamurti og øðrum fiskayngli. Kanningar verða nú gjørdar av føðini, sum skarvur etur. Meðan hendan kanning er í gongd, mæla tey til at steðga við avtøku av friðingini av skarvinum í hesum ári. Annars verður ikki mett rætt at friða fuglasløg óneyðuga leingi, tá fólk so venjast av við at eta viðkomandi fuglaslag, sjálvt um friðingin verður avtikin, og er hetta t.d. hent á ensku oyggjunum.

Lundin er friðaður frá 15. mars til 1. september, meðan lomvigi og álka eru friðað frá 1. apríl til 15. august. Mett verður, at friðingartíðin fyri øll 3 fuglasløgini eigur at vera samanfallandi av praktiskum orsøkum.

Doreta Block Danielsen og Andrias Reinert hildu, at spurningurin um friðingina av skúgvi átti at verið tikin upp aftur til nýggja viðgerð, tí stovnurin í Føroyum er lítil og hevur lítla útbreiðslu (Føroyar, ella Ísland og Jan Mayen).

Viðvíkjandi støðuni hjá lomvigunum varð upplýst, at hann framvegis er í minking, men tá ein stórur árgangur av norðhavssildini er á veg, kann hetta møguliga koma at bøta um støðuna.

Næsta ár eru tey 5 árini, sum lomvigin (og álkan) varð friðaður í, úti, og nevndin heldur, at ein tá samstundis eigur at taka støðu til, um broytingar skulu gerast í friðingarreglunum fyri onnur fuglasløg.

Nevndin tekur ikki undir við uppskotinum hjá uppskotsstillaranum.

Nevndin mælir tó til, at veiðitíðin fyri lunda verður tann sama sum fyri lomviga og álku, og setir sostatt fram fylgjandi

## Uppskot

## til

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.**

§ 1. Í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m. við seinni broytingum verður § 17, 2. stk., nr. b) orðað soleiðis:
»15. august — 1. april:
lunda.«

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om fuglefangst.**

§ 1. I lagtingslov nr. 27 af 9. september 1954 om fuglefangst m.v. med senere ændringer affattes § 17, stk. 2, nr. b) således:
»15. august — 1. april:
lunden.«

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð 1. mai. Uppskotið frá nevndini samtykt við 21-I atkvøðum.

7. mai legði tingmaðurin Ivan Johannesen, fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

Í § 1 í tí við aðru viðgerð samtykta broytingaruppskoti verður í føroyska tekstinum eftir orðið »lunda« og í donsku tekstini eftir orðið »lunden« sett: »skarv«.

3. viðgerð 9. mai. Broytingaruppskotið frá Ivan Johannesen o.fl. fall við 14-0 atkvøðum. Lógaruppskotið frá nevndini endaliga samtykt við 21-1 atkvøðum.

Lóg nr. 60 frá 5. juni 1984.

# 98. Samband um Haraldssund og Vestmannasund.

Ár 1984, fríggjadagin 23. mars legði Finnbogi Isaksen, løgtingsmaður fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum,

1) at farið verður beinanvegin og ikki seinni enn 1. juni 1984 undir gerð av føstum sambandi um Haraldssund, og
2) at landsstýrið letur landsverkfrøðingin gera detailprojekt og kostnaðarmeting av føstum sambandi um Vestmannasund, soleiðis at ætlanin kann leggjast fyri løgtingið til góðkenningar í august mánaði 1984.

**Viðmerkingar.**

Sum lið í landsvegakervinum varð fyri nøkrum árum síðani í smáum farið undir at gera veg í Kunoy til staðið, har tað ætlaða bergholið millum Kunoy og Haraldssund skal koma út Kunoyarmegin. Rættulig nytta fæst tó ikki fyri fólkið í Kunoy av hesum ætlaða bergholið uttan so, at fast samband eisini er um Haraldssund.

Eitt slíkt samband — við ella uttan siglingarrennu — fær eisini stóran týdning fyri Klaksvíkina. Tann góða Havnin, sum har er, verður uppaftur betur.

Í vetur spurdi landsstýrið seg fyri hjá Klaksvíkar kommunu um støðu hennara til spurningin. Men haðani fekst ongin støða, sum landsstýrið vildi góðkenna, og tí varð ikki — sum tað tóktist vera ætlanin — farið undir at gera fast samband um Haraldssund beinanvegin.

Her verður tí skotið upp, at farið verður undir hetta arbeiðið sum skjótast og ikki seinni enn 1. juni á ár. Áður hevur verið nevnt, at samband við siglingarrennu fór bert at dýrka projektið við 5 milj. kr. Er hetta rætt, heldur uppskotsstillarin tað vera beinast at hava eina rennu.

Eisini tankin um fast samband um Vestmannasund hevur verið frammi av og á, serliga í seinastuni. Út frá tí sjónarmiði, at tað er dýrt at byggja og reka fergu at sigla um sundið, eins og tað er dýrt at byggja og røkja fergulegur, heldur uppskotsstillarin tað vera rætt at gera nakað álvarsligt við ætlanina um fast samband. Men av tí at hetta projektið má metast at vera stórt, verður í fyrstu syftu mælt til, at landsverkfrøðingurin ger eitt detailprojekt og eina kostnaðarmeting til løgtingið at taka støðu til seinni í ár.

1. viðgerð 27. mars 1984. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av Finnboga Isaksen tann 23. mars 1984 og undir 1. viðgerð 27. mars 1984 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í 6 minnilutar.

Minnilutin (Ivan Johannesen og Sv. Åge Ellefsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir fram soljóðandi

**uppskot**
**til**
**samtyktyar**

Heitt verður á landsstýrið um at lata gera kostnaðarmetan av byrging við brúgv og siglingarrennu um Vestamannasund.

Eisini verður heitt á landsstýrið um at láta serkønar innan alivinnu gera metingar av alimøguleikunum í Vestmannasundi eftir at slík byrging er gjørd. Úrslitið verður at leggja fyri løgtingið komandi tingsetu.

Ein annar minniluti (Hilmar Kass) setir einki uppskot fram.

Ein triðji minniluti (Juul Jacobsen) setir einki uppskot fram.

Fjórði minnilutin (Atli P. Dam) tekur støðu í tingsalinum.

Fimti minnilutin (Øssur Dam Jacobsen) førir fram:

Av tí at fast samband um Vestmannasund helst kemur at skerja

siglingarleiðina gjøgnum sundi munandi, sjálvt um siglingarrenna verður gjørd, tekur minnilutin ikki undir við uppskotinum.

Sætti minnilutin (Ove Mikkelsen) mælir í fyrsta lagi til at samtykkja uppskot Finnboga Isaksens og í øðrum lagi tekur Ove Mikkelsen undir við uppskotinum hjá Ivan Johannesen og Sv. Äge Ellefsen.

2. viðgerð 7. mai. Atkvøðugreiðsla 8. mai. Uppskotið pkt. 1 samtykt við 17-0, pkt. 2 fall við 10-0. Uppskotið frá minnilutanum í nevndini varð samtykt við 19-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1817-57.

---

# 99. Avtøka av regluni um kravda skattaváttan, tá rúsdrekka v.m. skal loysast út.

Ár 1984, fríggjadagin 23. mars legði Finnbogi Isaksen, løgtingsmaður fram soljóðandi

**I.**

**Uppskot til**

**løgtingslóg um broyting í rúsdrekkalógini.**

**lagtingslov om ændring af vandrängeloven.**

§ 1. Í lóg fyri Føroyar nr. 115 frá 4. apríl 1928 »om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m.« verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í 1. grein, 2. stk. ganga út orðini:

»Við tílíkari sølu krevjast tey somu prógvini frá keypara fyri ikki at skylda skatt v.m., sum tá ið rúsdrekka verður innflutt.«

2) 3. grein, 4. stk. gongur út.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1984.

§ 1. I lov for Færøerne nr. 115 af 4. april 1928 »om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m.« foretages disse ændringer:

1) I § 1, 2, stk. udgår ordene:

»Ved sådant salg kræves de samme bevisligheder fra køberen for ikke at skylde skat m.v. som ved indførsel af berusende drikke.«

2) § 3, stk. 4 udgår.

§ 2. Denne lov træder i kraft 1. april 1984.

## II.

## Uppskot til samtyktar.

Løgtingið samtykkir, at tann peningur, sum verður spardur við at seta lógina frammanfyri í gildi, skal býtast út til fráhaldsfeløgini at nýta í arbeiðinum at upplýsa um vandan, ið kann standast av ovurnýtslu av rúsdrekka.

Landsstýrið ger nærri reglur um hetta.

**Viðmerkingar.**

Í mong ár hevur tann skipan verið galdandi í Føroyum, at tann, sum loysir út rúsdrekka, sterkari øl og vín, skal hava skattaváttan at vísa fram. Hetta hevur verið eitt lið í royndunum at fáa skattin so væl inn sum gjørligt. Skipanin tykist tó ikki at hava munað nóg nógv tey seinastu árini, eftirsum skattaeftirstøðurnar hava verið alsamt vaksandi.

1. apríl í ár kemur samtíðarskattaskipanin í gildi. Talið á skattagjaldarum liggur um 33.000, harav B-skattgjaldarar eftir líkningarvaldsins meting verða einir 2100. Í prinsippinum er bert vandi fyri, at hesir 2100 koma at skylda skatt. Hjá øllum hinum næstan 32.000 verður skatturin tikin burturav, áðrenn teir fáa lønina.

Sostatt er so at siga onki grundarlag fyri at krevja skattaváttan eftir 1. apríl frá teimum, sum ætla at loysa rúsdrekka v.m. út.

Skipanin er arbeiðskrevjandi og kostnaðarmikil. Eini trý fólk á skattadeildini gera onki annað enn at skriva skattaváttanir til teirra, sum loysa rúsdrekka v.m. út. Hetta kostar sostatt við lønum og postgjaldi minst eina hálva milj. kr. um árið.

Fyri at nýta hendan sparda peningin á mest gagnligan hátt verður skotið upp, at hann verður latin fráhaldsfeløgunum til arbeiði at upplýsa um vandan, ið kann standast av ovurnýtslu av rúsdrekka.

1. viðgerð 28. mars. Uppskot um at beina málið í sosialu nevndina fall við 4-0 og uppskot um at beina málið í lóganevndina fall við 9-0. Málið varð síðani beint í skattanevndina, sum 26. apríl 1984 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð framlagt av Finnboga Isaksen, løgtingsmanni, og varð undir 1. viðgerð 28. mars beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Finnbogi Isaksen, Vilhelm Johannesen og Jógvan Sundstein) tekur undir við uppskotinum, meðan minnilutin (Eli Nolsøe og Hilmar Kass) vísir á, at landsstýrið arbeiðir við málinum, og tekur tí onga støðu.

1. mai løgdu Jákup Lindenskov, Agnar Nielsen, Adolf Hansen, Jørgen Thomsen og Fredrik Olsen fram soljóðandi

## broytingaruppskot

Í § 1, 2. stk. í lóg fyri Føroyar nr. 115 frá 4. apríl 1928 »om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m.« verður sett sum nýtt 3. stk.:

»Forboðið verður at flyta inn og nýta tól og útgerð til tilgerð av víni og øðrum rúsandi løgum.«

I § 1, stk. 2 i lov for Færøerne nr. 115 af 4. april 1928 »om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m.« indsættes som nyt stk. 3:

»Det er forbudt at importere apparatur og udrustning med henblik på produkter af vine og andre berusende drikke.«

2. viðgerð 1. mai. § 1 fall við 15 ja-atkvøðum, 6 nei-atkvøðum, 10 atkvøddu ikki og 1 var burturstaddur. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

| | |
|---|---|
| Ja atkvøddu: | Asbjørn Joensen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Ingrid Sondum, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen, Poul Mikkelsen, Øssur Dam Jacobsen, Edmund í Garði og Jógvan Sundstein. |
| Nei atkvøddu: | Agnar Nielsen, Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Jákup Lindenskov, Johs. M. Olsen, Jógvan Olsen. |
| Atkvøddu ikki: | Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Arne Ziskasen, Svend Age Ellefsen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Eli Nolsøe og Dánjal Larsen. |
| Burturstaddur: | Flemming Mikkelsen. |

---

# 100. Fyrispurningar.

Sí bls. 706.

# 101. Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skiftisreglur í samband við samtíðarskatt.

Ár 1984, fríggjadagin 23. mars legði Jóannes Dalsgaard, løgtingsmaður fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skiftisreglur í samband við samtíðarskatt.**

§ 1. Í løgtingslóg nr. 118 frá 29. desember 1983 um skiftisreglur í samband við samtíðarskatt verður gjørd henda broyting:
Í § 3, 1. stk. verður skoytt uppí: »Fyribilsskattur verður ikki avroknaður í inntøkum, sum eru vunnar í mars 1984, men útgoldnar í apríl 1984.«

§ 2. Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1984.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om overgangsbestemmelser ved indførelse af kildeskat.**

§ 1. I lagtingslov nr. 118 af 29. december 1983 om overgangsbestemmelser ved indførelse af kildeskat foretages denne ændring:
I § 3, stk. 1 tilføjes: »Foreløbig skat skal ikke erlægges af indtægter, der er forvundet i marts 1984, men udbetalte i april 1984.«

§ 2. Denne lov træder i kraft 1. april 1984.

**Viðmerkingar:**
Tímaløntir løntakarar fáa løn sína fyri síðstu viku av mars í ár útgoldna í fyrstu viku av apríl.

Hjá hesum skattgjaldarum verður sostatt eftirbildi fyri skatt av inntøkum í síðstu viku av mars, meðan tað hjá t.d. fastløntum skattgjaldarum, sum fáa lønina útgoldna 26. mars, ikki verður eftirhildið fyri skatt, fyrr enn við lønútgjalding 25. ella 26. apríl.

Fyri at bøta um hetta órættvísi mótvegis teimum tímaløntu løntakarunum setir javnaðarflokkurin fram hetta uppskot um broyting í løgtingslóg um skiftisreglur.

1. viðgerð 27. mars. Málið varð beint í skattanevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð framlagt av Javnaðarflokkinum hin 23. mars 1984 og varð undir 1. viðgerð hin 27. s.m. beint í skattanevndina.

Uppskotsstillarin mælir til at gera broytingar í skiftisreglunum í samband við samtíðarskatt, soleiðis at fyribilsskattur ikki verður avroknaður í inntøkum, sum eru vunnar í mars 1984, men útgoldnar í apríl 1984.

Skattanevndin hevur eisini fingið brøv í samband við skiftisreglurnar frá føroyingum í útlendskari vinnu, starvsfólki á Landssjúkrahúsinum og Føroya Arbeiðarafelag.

Skattanevndin hevur havt málið til viðgerðar og hevur býtt seg í ein meirilutа og ein minniluta.

Meirilutin (Fli Nolsoe, Jógvan Sundstein og Hilman Kass) v[illegible] á, at eftir samtíðarskattalógini verður skatturin eftirbildin, tá ið tann verður útgoldin, og at øll samtíðarskattaskipanin byggir á tann megnu reglu, at skatturin fellur til gjaldingar samtíðis, sum inntøkan verður útgoldin.

A-inntøkur, sum verða útgoldnar aftanfyri 1. apríl 1984, verða tó at rokna sum skattskyldugar, sjálvt um tær eru vunnar frammanundan, og alt inntøkuárið 1984 verður gjørt upp av nýggjum, áðrenn endaligi skatturin verður álíknaður á vári 1985.

Meirilutin tekur tí onga stoðu í málinum.

Minnilutin (Vilhelm Johannesen og Finnbogi Isaksen) [illegible] at uppskotið frá Javnaðarflokkinum [illegible] um skatting av tí seinastu virkalønunum [illegible].

Nú so long tíð er liðin, [illegible]

minnilutin, at tíðin er farin frá uppskotinum. Eisini er minnilutin vitandi um, at flestu arbeiðsgevarar og útgerðarfeløg royndu at avgreiða sum mest av lønum og hýrum so tætt uppundir mánaðarskiftið sum møguligt, fyri harvið at halda hesar útgjaldingar uttan fyri afturhaldsskipanina. Við hesum hevur upprunaliga uppskotið mist sín týdning.

Ein annar spurningur í sambandi við samtíðarskattaskipanina er frítíðarlønin. Tað ljóðar, at summir arbeiðsgevarar hava ávíst frítíðarløn og/ella frítíðargjaldið áðrenn 1. apríl. Í hesum førum verður frítíðarlønin og/ella frítíðargjaldið hildin uttan fyri afturhaldsskipanina. Hjá teimum, sum fáa frítíðarmerkir, verður frítíðarlønin eisini hildin uttan fyri afturhaldsskipanina, meðan frítíðarlønin og/ella frítíðargjaldið hjá øllum hinum kemur undir afturhaldsskipanina.

Tað, at frítíðarløn og/ella frítíðargjald kemur undir afturhaldsskipanina, merkir ikki einans tað, at skattur verður eftirhildin í hesi útgjalding. Av tí at frítíðarløn verður útgoldin fyrst í skattaárinum, merkir hetta eisini, at skattgjaldarin verður afturhildin fyri munandi størri upphædd enn hann verunliga eigur at rinda. Og tað tekur fleiri mánaðir, áðrenn skattgjaldarin fær peningin aftur.

Minnilutin heldur hetta vera órímiligt og eisini heldur minnilutin, at tað er órættvíst, at slíkur munur verður gjørdur á skattgjaldarum, og tí mælir minnilutin til, at øll frítíðarløn og/ella frítíðargjøld útgoldin í 1984, verða hildin uttan fyri afturhaldsskipanina.

Ístaðin fyri upprunaliga uppskotið frá Javnaðarflokkinum seta umboðini fyri Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin fram

**uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skiftisreglur í sambandi við samtíðarskatt.**

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om overgangsbestemmelser i forbindelse med kildeskat.**

§ 1. Í løgtingslóg nr. 118 frá 29. december 1983 um skiftisreglur í sambandi við samtíðar-

§ 1. I lagtingslov nr. 118 af 29. december 1983 om overgangsbestemmelser i forbindelse med

skatt verður gjørd hendan broyting:

Í § 3, 1. stk. verður skoytt uppí: »Fyribilsskattur verður ikki avroknaður í frítíðarløn og frítíðargjaldi útgoldin í 1984.«

kildeskat foretages følgende ændring:

Til § 3, stk. 1, tilføjes: »Foreløbig skat afregnes ikke i ferieløn og feriepenge udbetalt i 1984.«

Ein samd nevnd skjýtur upp, at innheintingarreglurnar í samtíðarskattalógini verða settar í gildi fyri feløg, ið koma at gjalda skatt í skattaárinum 1984/85, t.v.s. at skatturin hjá feløgum fyri nevnda skattaár fellur til gjaldingar í 3 gjøldum 1. oktober, 1. november og 1. december 1984, eins og freistin fyri innlating av sjálvuppgávu fyri feløg verður løgd til 1. juni 1984, og setir fram soljóðandi

**uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skiftisreglur í samband við samtíðarskatt.**

**§ 1.** Í løgtingslóg nr. 118 frá 29. december 1983 um skiftisreglur í samband við samtíðarskatt verður henda broyting gjørd:

Sum nýtt 2. stk. í § 4 verður sett:

*2. stk.* Fyri feløg undir fullari skattskyldu nevnd í § 1 nr. 8-14 í løgtingslóg nr. 86 um landsskatt og kommunuskatt (samtíðarskattalógin) frá 1. september 1983 og feløg undir avmarkaðari skattskyldu eftir § 2 í somu løgtingslóg eru reglurnar um skattainnheinting eftir § 81 og reglurnar fyri innlating av

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om overgangsbestemmelser ved indførelse af kildeskat.**

**§ 1.** I lagtingslov nr. 118 af 29. december 1983 om overgangsbestemmelser ved indførelse af kildeskat foretages følgende ændring:

Som nyt stk. 2 i § 4 indsættes:

*Stk. 2.* For selskaber under fuld skattepligt nævnt i § 1 nr. 8-14 i lagtingslov nr. 86 om landsskat og kommuneskat (kildeskatteloven) af 1. september 1983 og selskaber under begrænset skattepligt efter § 2 i samme lov er reglerne om skatteopkrævning efter § 81 og reglerne om indgivelse af selvangivelse efter § 100 i lagtingslov nr. 86

sjálvuppgávu eftir § 100 í løgtingslóg nr. 86 um landsskatt og kommunuskatt frá 1. september 1983 galdandi fyri skattaárið 1984/85.

om landsskat og kommuneskat af 1. september 1983 gældende for skatteåret 1984/85.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð 7. mai. Atkvøðugreiðsla 8. mai. Uppskot frá samdari nevnd § 1 — nýtt 2. stk. í § 4 — varð samtykt við 31-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 31-0 atkvøðum. Uppskot frá minnilutanum í nevndini fall við 13-0 atkvøðum.

3. viðgerð 8. mai. Málið endaliga samtykt við 20-9 atkvøðum.

Lóg nr. 56 frá 5. juni 1984.

---

# 102. Lastbilarnir hjá Strandferðsluni.

Ár 1984, friggjadagin 23. mars legði Jóannes Dalsgaard, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Føroya Løgting tekur ætlanir landsstýrisins um at selja lastbilarnar hjá Strandferðsluni til umrøðu.

**Viðmerkingar:**
Landsstýrismaðurin Anfinn Kallsberg boðar í Dagblaðnum tann 21. mars 1984 frá, at teir lastbilar, sum Strandferðslan eigur, nú skulu bjóðast út til sølu. Samstundis upplýsir hann, at tann farmaflutningur. sum tað almenna higartil hevur rikið á landi, skal privatiserast.

Javnaðarflokkurin metir, at hetta er eitt so mikið álvarsamt mál, at løgtingið eigur at taka tað til viðgerðar sum skjótast, soleiðis at tingið kann taka støðu til, hvørt avgerð landsstýrisins er í tráð við tann samferðslupolitikk, sum hevur verið rikin hesi seinastu árini.

Javnaðarflokkurin minnir á, at hvørki brúkarin ella tey, sum í løtuni starvast innan hesa almennu vinnu eru tikin við uppá ráð. Ei heldur er vandin fyri einari munandi verri tænastuveiting umrøddur.

Út frá hesum mælir flokkurin til, at alt málið verður viðgjørt á løgtingi og setir javnaðarflokkurin tí fram hetta uppskotið til samtyktar.

1. viðgerð 27. mars 1984. Málið varð beint í lóganevndina, sum 8. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av Javnaðarflokkinum 23. mars 1984 og varð við 1. viðgerð beint í lóganevndina.

Í sjálvum uppskotinum til samtyktar lá bert tað, at tingið tók til umrøðu spurningin um lastbilakoyringina hjá Strandferðsluni. Nevndin hevur viðgjørt málið m.a. á fundi saman við Johan Restorff Jacobsen, stjóra á Strandferðsluni og Kristoffer Joensen, pakkhúsforvaltara hjá Strandferðsluni, sum er dagligur leiðari av bilflutningi Strandferðslunnar.

Í sjálvari umrøðuni á tingi vóru serliga tey viðurskifti nevnd, at ætlan landsstýrisins var at flyta farmaflutningsuppgávuna hjá Strandferðsluni á privatar hendur út frá tí sjónarmiði, at tað vildi fremja ein effektivari og kostnaðarminni rakstur og hartil betri røkt av flutningsførunum enn undir almennum rakstri.

Hjálagt hesum áliti eru løgd skjøl við taltilfari og viðmerkingum um viðurskiftini í sambandi við henda rakstur hjá Strandferðsluni.

Umboðini hjá Strandferðsluni løgdu stóran dent á, at hesin part-

urin av samferðsluuppgávunum, sum Strandferðslan røkir, neyvan kann gerast rakstrarliga ódýrari og við teimum fleirtáttaðu uppgávunum, sum liggja á Strandferðsluni, kann ikki annað enn sigast og deils talprógvast, at raksturin neyvan vil vera bíligari á privatum hondum, helst væl dýrari.

Farmaflutningur eftir landi er um allar oyggjarnar uttan smá- og útoyggjarnar.

Tveir smærri bilar eru komnir aftrat til at taka sær av tí koyring, sum er í samband vi ta nýggju helikoptaraflúgvingina.

Tað framgongur av uppskotinum, at landsstýrið hevur ætlað at leggja fraktruturnar eftir landi á privatar hendur, tó so at hetta ikki minkar um tað tænastustøði, sum nú er. Allar rutur í dag eru beinleiðis undir Strandferðsluni uttan á Sandoynni. Har verður uppgávan røkt av privatum partafelag, men lønar- og undirskotsútreiðslur goldnar av Strandferðsluni.

Eftir tí, sum upplýst er, heldur nevndin, at tænastustøðið av farmakoyring Strandferðslunnar eftir landi er rættiliga gott. Hesin flutningur røkkur til dyrnar hjá fólki og virkjum allastaðni uttan í Havn, Vági, Tvøroyri og Klaksvík. Á hesum plássum verða vørur heintaðar á pakkhúsi.

Annar spurningurin, ið tók seg upp, varð, um tað ikki vóru møguleikar til samskipan av eini koyring við aðrar stovnar, ið hava ferðslu fyri neyðini, so sum postverkið, eins og tað má umhugsast, um ikki farmaflutningurin sjóvegis kundi avloyst onkra av hesum bilflutningsrutunum.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Asbjørn Joensen, Agnar Nielsen og Arne Ziskasen) mælir til, at landsstýrið tekur tað undanførda til gjølla umhugsan, áðrenn ein støðutøka til broyting í verandi skipan, og setir meirilutin einki uppskot fram, meðan minnilutin (Jákup Lindenskov og Petur Reinert) mælir frá at landsstýrið ger nakað við spurningin um at broyta verandi ábyrgd og skyldur hins almenna í sambandi við farmaflutning eftir landi.

2. viðgerð 8. mai. Málið avgreitt uttan atkvøðugreiðslu.

F.L.j.nr. 1800-54-1.

# 103. Uppskot til samtyktar viðvíkjandi ferðamanna terminalum — innandura bíðirúmi í Tórshavn.

Ár 1984, fríggjadagin 23. mars legði Ove Mikkelsen, løgtingsmaður fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir, at landsstýrið saman við Strandferðsluni beinanvegin tekur upp samráðingar við Tórshavnar Býráð um bygging av einum hóskandi ferðamanna-terminali — einum innandura bíðirúmi — á havnaøkinum í Tórshavn.

**Viðmerkingar:**
Tórshavn er miðdeplið í allari ferðing innan- sum uttanlands. Ein skal altíð yvir Havnina.

Rutuskipini eru ikki altíð til tíðina, men ofta seinkað. Eitt nú á Suðuroyar-rutuni, tá báturin kemur úr Suðuroy á kvøldi, og er tað ikki óvanligt, at fólk mugu standa úti á kaiini í Havn og bíða eftir »Smyrli« bæði ein hálvan tíma — ja í ein tíma eisini — uttan høvi til at kroka nakrastaðni.

Veðurlagið í Føroyum er nú einaferð so vorðið, at tað bæði stormar og regnar ofta, so óvanligt er ikki, at ferðafólk til Suðuroyar ofta eru bæði gjøgnumvát og fryst, áðrenn tey sleppa umborð, eins og viðførið er gjøgnumblovt.

Tá talan er um ferðafólk, ið koma uttanífrá, er tað enn verri, tí har verður bíðitíðin altíð munandi longri, eins og hesi fólk altíð hava nakað væl av viðføri við sær. Dýrt er at ferðast, eisini innanoyggja, og slíkt sum hetta, at fólk mugu standa undir opnum himli í øllum veðri og bíða eftir rutubátunum, kann ikki bjóðast ferðafólki í 1984.

Skal ein á wc, noyðist ein heilt niðan á Vaglið, tí slíkur hentleiki finst ikki á Havnar kai.

Í Lorvík varð eitt bíðihús gjørt, hvar ein fær sitið inni, og har bæði w.c., vask og telefon eru tøk. Eitt frálíkt tiltak. Tí loyvi eg mær at skjóta upp, at slíkt bíðihús verður bygt á havnarøkinum í Tórshavn. At Tórshavnar havn — Tórshavnar Býrað — tekur lut í fígging og rakstri av slíkum húsi, meti eg, at vera rímiligt, síðan Tórshavnar havn og býur fáa alla inntøkuna av allari uttanlands ferðing eins og størsta ágóðan av innanoyggja ferðamannaflutninginum.

1. viðgerð 27. mars. Málið varð beint í vega- og havnanevndina, sum 7. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av Ova Mikkelsen 23. mars 1984 og undir 1. viðgerð 27. mars 1984 beint í Vega- og Havnanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og tekur ein samd nevnd undir við uppskotinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Hin vegin metir nevndin, at tørvurin á hóskandi bíðirúmum og skýlum er at kalla landsumfatandi og tí fram soljóðandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Heitt verður á landsstýrið um saman við strandferðsluni og bygdaleiðum at kanna tørvin á hóskandi bíðirúmum í samband við ferjulegur, tyrlupallar og buss-steðgipláss kring landið og at bera so í bandi, at hesin tørvur verður nøktaður.

2. viðgerð 8. mai. Uppskotið samtykt við 23-0 atkvøðum. Uppskotið frá nevndini samtykt við 24-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1800-5-17.

# 104. Uppskot til samtyktar um skipaíløgupolitikk landsstýrisins.

Ár 1984, fríggjadagin 23. mars legði Jóannes Dalsgaard, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

1. Løgtingið tekur til viðgerðar skipaíløgupolitikk landsstýrisins, herundir hvørjar meginreglur liggja aftanfyri, tá landsstýrið játtar umleggingar- og umbyggingarlán og veðhald, siktið í sáldinum ímillum menn og feløg, sum fáa loyvi at fara í ymsar veiðuhættir, hvørjar grundir eru fyri at ávís feløg og summir einstaklingar ongantíð fáa svar uppá umsóknir til landsstýrið, soleiðis at tey koma í »klemmu« ímillum ætlanir, sum kundu hjálpt teimum at greiða skyldur sínar og dagligu krøvini, sum nú ikki kunnu greiðast, tí skipini verða noydd at halda fram í órentablari vinnu, meðan bíðað verður í áravís eftir svari o.s.fr.

2. Løgtingið tekur til viðgerðar búskaparligu avleiðingarnar av skipainnflutningsbanninum, soleiðis sum tær sýna seg í gjaldsjavnahalli og uttanlandsskuld.

Hvørjar avleiðingar eiga at verða tiknar í skatta- og avskrivingarpolitikki.

**Viðmerkingar:**
Sum kunnugt hevur valdað fullkomin tilvild viðvíkjandi skipaíløgum nú í 3 1/2 ár.

Harumframt er prógvað, at menn og feløg hesa tíð ikki hava kunnað kent seg »líka fyri lógini«.

Metingar landsstýrisins um samsvarið millum veiðutrýst og stovnsmagn á grunnum vatni, meðalvatni og djúpum vatni hava higartil verið duldar fyri figgjarnevnd og løgtingið, eins væl og metingarnar viðvíkjandi samsvarinum ímillum veiðuorku til tær ymsu leiðirnar ella sáttmálarnar og møguleikarnar á hesum leiðum.

Rikni politikkurin hevur borið í sær, at ógvuliga lítil nýskapan er framd hesi árini. Endurnýggingin og ábótin á flotan er í høvuðsheitum framd sum umbygging, leinging og nútíðargerð av eldri skipum, skipum, sum í mongum førum eru seld fyri ovurstórar yvirprísir, tí hvørt skipið sær ikki bert umboðar egið virði, men eisini virði av einum fiskiloyvi og einum vinnurætti, sum ein orkar at keypa sær.

Henda dýrkan av vinnutólum okkara, sum onga verunliga øking av framleiðsluorku goymir, fremur aftur eitt trýst á stuðulsveitingina til fongin, tí legan í hesi veiting verður løgd eftir tørvinum hjá meðalriknum skipum.

Skal nú afturat setast í gildi ein altfevnandi loyvisskipan, har bert teir, sum av landsstýrinum eru vegaðir og ikki »funnir ov lættir« skulu eiga møguleikarnar, so avskeplast prísleganog stuðulsveitingin upp aftur meira.

Greitt er, at ikki ber til at geva leyst fyri innflutningi av skipum, men neyðugt er at stýra útskiftingini og endurnýggingini av fiskiskipaflotanum og tað kann ikki vera rætt, at hetta hendir á slíkan hátt, at bert teir, sum sjálvir kunnu keypa sær arbeiðspláss fyri »spekulatiónsprísir«, sleppa at reka fiskivinnuna.

Møguleikin fyri arbeiði og virkan má verða lógartryggjaður øllum íbúgvum landsins á jøvnum føti.

1. viðgerð 28. mars 1984. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 7. mai legði fram soljóandi

## Álit

Málið varð lagt fram av javnaðarflokkinum tann 23. mars 1984 og undir 1. viðgerð tann 28. mars beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Sv. Age Eliefsen, Óssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) setir einki uppskot fram, tá málið eftir áskoðan teirra hevur fingið viðgerð á tingi undir 1. viðgerð av tingmálinum.

Minnilutin (Ali P. Dam, Ove Mikkelsen og Juul Jacobsen) førir fram:
Í fíggjarnevndini er lítil áhugi fyri verunligari viðgerð av hesum sera týðandi búskaparspurningi. Tá meirilutin sigur, at tingið longu hevur havt umbidnu viðgerð av málinum, er hetta ein sera jánkaslig umbering og minnir mest um eina roynd at fjala tað orku- og evnaloysið, sum hevur eyðkent allan íløgupolitikkin nú í hálvtfjórða ár. Eisini má hetta skiljast sum ein roynd at káva útyvir tann verunleika, at meginparturin av teim íløgum, framdar eru, eru sokallaðar vina- og kenningaíløgur, ella fylgja av vina- og kenningaíløgum, tá mismunurin vildi komið alt ov sjónliga fram, slapp ikki eisini okkurt hissini felag at fremja sama slag av íløgum sum vinirnir og kenningarnir.

Men hetta slag av »alibipolitikki« hevur so í tilvildini borið í sær, at stýringin hevur verið snøgt sagt eingin, at verandi veiðufloti er skrúvaður heilt óverunligt upp í prísi við harav fylgjandi trýsti á stuðulsskipanina og gjaldsjavnvágina.

Undir hesi fyrstu viðgerð, sum meirilutin heldur er nóg mikið, valdaði annars stórt sæð ein ógvuliga talandi tøgn um spurningin. Onkur einstakur fólkafloksmaður váttaði, at tað sum er ført fram í viðmerkingunum samsvarar við tey viðurskifti, ið hava valdað.

Henda talandi tøgn lýsir betur enn annað, at partar av samgonguni hava áluga í at so spakuliga verði gingið um hurðarnar sum gjørligt í hesum máli.

Havandi í huga váttanina frá formanni sjálvstýrisfloksins um ta politisku korruptión, sum mangar landsstýrisavgerðir um íløgur og stuðul bera í sær, er hetta ikki løgið.

Grefligastu dømini eru Star-skipini, sum vóru bygd uttan at lógarkravdi eginpeningurin var váttaður og Jatnaklettamálið, har landsstýrið slepti teirri persónligu trygd, sum ánararnir — serliga nær høkuni — annars ábyrgdust.

Minnilutin hevur roynt at fáa til vega uppstilling viðvíkjandi øllum innflutningsloyvum, byggisáttmálum, umbyggingarjáttanum og -sýtingum hesi árini til nýtslu undir viðgerðini í fíggjarnevndini. Ein part av hesum tilfari hevur minnilutin fingið, men so seint, at sokallaða viðgerðin í fíggjarnevndini tá var liðug.

Nú um dagarnar frættist, at nú hevði landdstýrið avgjørt, at umsóknir, sum hava ligið í landsstýrinum í áravís, »allarnådigst« skulu fáa svar. Hetta er so kortini eitt úrslit — um enn soltið — av áhald-

andi trýsti andstøðunnar ímóti ti umsitingarliga »anarki«, landsstýrið hevur stovnsett í Føroyum.

Í hesum valskeiði er so ov seint at fáa skipað rættarviðurskifti at galda aftur, her má brótast upp úr nýggjum av komandi landsstýri, skulu ikki avleiðingarnar verða, at okkum ikki býðst bót búskaparliga.

2. viðgerð 8. mai. Málið varð avgreitt uttan atkvøðugreiðslu.

---

# 105. Broyting í vallógini.

Ár 1984, fríggjadagin 23. mars legði Finnbogi Isaksen, løgtingsmaður fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

| | |
|---|---|
| løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Føroya Løgting. | lagtingslov om ændring i lagtingslov nr. 49 af 20. juli 1978 om valg til Færøernes Lagting. |
| § 1. 1) 17. grein, 2. stk. verður orðað soleiðis: | § 1. 1) § 17, stk. 2 får denne ordlyd: |
| »Ein valevnislisti má ikki hava fleiri valevni enn tvey fleiri enn talið á løgtingsmonnum, ið veljast skulu í valdøminum.« | »En kandidatliste må ikke indeholde flere navne end to mere end antallet af lagtingsmænd, som skal vælges i valgkredsen.« |

2) Í 17. grein, 5. stk. verður talið »10« broytt til »5« og talið »15« til »10«.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

2) I § 17 stk. 5 ændres tallet »10« til »5« og tallet »15« til »10«.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Tá lógin um val til Føroya Løgting varð broytt í 1978, varð talið á valdømisvaldum tingmonnum økt úr 20 upp í 27. Samstundis varð ásett, at talið á valevnunum kundi vera tað dupulta av valdømisvaldum løgtingsmonnum. Hetta merkir t.d., at í Norðoyggjum kunnu vera 8, í Suðurstreymoy 16 og í Sandoynni 4 valevni.

Mett verður, at talið á valevnum er ov stórt, bæði tí at tað kann vera torført at fáa valevni, og tí at hetta stóra talið ger løgtingsval meira til eitt »familjuval« enn eitt politiskt val.

Skotið verður tí upp at avmarka talið á valevnum til 2 fleiri enn valdømisvaldir tingmenn, t.v.s. í Norðoyggjum til 6, í Suðurstreymoy til 10 og í Sandoynni framvegis til 4.

Eisini verður mett, at stillaratalið — minst 10 og mest 15 — er heldur nógv. Skotið verður upp at broyta tølini til 5 og 10.

1. viðgerð 27. mars 1984. Málið varð beint í lóganevndina, sum 13. apríl 1984 legði fram soljóðandi:

## Álit

Uppskotið varð framlagt av Finnboga Isaksen tann 23. mars 1984 og við 1. viðgerð 27. s.m. beint í lóganevndina.

Í uppskotinum verður mælt til at lækka talið á valevnum frá at vera tað dupulta av valdømisvaldum limum niður í talið av valdømisvaldum + 2 limir. Eisini verður skotið upp, at lækka talið á stillarum til 5 og hægst 10 móti nú 10 og hægst 15.

Nevndin hevur viðgjørt málið og setir fram fylgjandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Málið verður beint í milluntinganevndina til viðgerðar av stýrisskipanarlógini.

2. viðgerð 27. apríl. Uppskotið til samtyktar varð samtykt við 21-0 atkvøðum. Málið var samstundis beint til stýrisskipannarnevndina og er ikki komið aftur hagani.

---

# 106. Viðvíkjandi flutningi av viðføri til og frá flogvøllinum.

Ár 1984, fríggjadagin 23. mars legði Ove Mikkelsen, løgtingsmaður fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum at samráðast við bussleiðir Tórshavn/Vestmanna-rutuni um at útvega sær hóskandi bil til at flyta viðføri hjá ferðafólki á flogrutuni, soleiðis at viðførið fyri eykagjald kann latast inn á Bil í Havn og verður so fyrst útflýggjað á flogvøllinum, eins og hinvegin at viðføri fyri eykagjald kann flytast beinleiðis av flogvøllinum og til Bil í Havn.

**Viðmerkingar:**
Øll vita, hvussu trupult tað er við viðføri hjá teimum túsundtals ferðafólkum, sum av einari ella aðrari orsøk fara uttanlands við flogfari. Fyrst skal ein fáa alt oman á Bil, og tá Bussurin kemur, sleipa kuffert og annað yvir til bussin, í Vestmanna bera alt umborð á »Sam«, og aftur í land á Oyragjógv yvir til bussin har, og á flogvøllinum úr bussinum inn í floghøllina.

Knossið er sjálvandi tað sama, tá ein kemur heim aftur og skal av flogvøllinum og til Havnar, og flestu fólkini skulu jú um Havnina.

Tað er eisini vanligt, at flestu ferðafólk hava væl av viðføri við sær bæði niður og upp, eins og tað ímillum hesi ferðafólk ofta eru eldri ella veik fólk, eins og mammur við børnum, sum hava ilt við at klára hetta, at sleipa viðføri 4 ferðir, áðrenn tú kemur á mál.

Slíkt fyribrigdi finst í øllum heiminum bert í Føroyum, og vildu øll fegin goldið eitt sindur eyka, um tað var gjørligt at lata inn viðføri ávikavist í Havn ella á flogvøllinum, so ein var leysur av tí, til ein kemur til Havnar ella á flogvøllin.

Sostatt loyvi eg mær at seta frammanfyri standandi uppskot til samtyktar fram.

1. viðgerð 30. mars 1984. Málið varð beint í vega- og havnanevndina, sum 7. mai legði fram soljóðandi

**Áiit**

Málið varð framlagt av Ova Mikkelsen hin 23. mars 1984 og undir 1. viðgerð hin 30 s.m. beint í Vega- og Havnanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sv. Åge Ellefsen, Johs. Martin Olsen, Eli Nolsøe og Frederik Olsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Hans Marius Joensen, Ingrid Sondum og Hilmar Bech) tekur undir við uppskotinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 8. mai. Uppskotið varð samtykt við 17-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1805-37.

# 107. Uppskot til samtyktar viðvíkjandi landgangstrappu til Smyril/Teistan.

Ár 1984, fríggjadagin 23. mars legði Ove Mikkelsen, løgtingsmaður fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir, at landsstýrið áleggur og hjálpir Strandferðsluni við at fáa sáttmála í lag við Tórshavnar-, Tvøroyrar-, og Vágs havn og býráð um at fáa loyvi til at seta eina landgangstrappu, sum røkkur upp til salongdekkið á Teistanum/Smyrli á nevndu kaiøkjum, ein hálvan tíma fram frá tí, at skipið er komið til kai, eins og ein hálvan tíma, áðrenn skiðip fer, og til tað siglir, soleiðis at ferðafólk sleppa beinleiðis til og frá salongdekkinum.

**Viðmerkingar:**
Flestu tingmenn hava væl ferðast við Smyrli/Teistanum til Suðuroyar og vita, at einans slepst umborð og í land av bildekkinum, og hvussu ein má skora seg fram millum bilarnar fyri at koma til portrið.

Tað kemur nokk so ofta fyri, at sjúklingar á børu mugu flytast av Suðuroyar sjúkrahúsi til Landssjúkrahúsið. Hetta gerst einans við, at sjúkrabilurin úr Suðuroy má allan vegin til Havnar við Sjúklinginum, tí sjúkrabøra fæst ikki frá bildekkinum og upp í erva. Væl finst ein elevator, men hann rúmar ikki einum rullistóli. Sjúklingurin saman við sjúkrasystir og portøri mugu verða verandi á

bildekkinum í øllum bilosanum og kuldanum, eins og ofta er ringt at sleppa til í sjúkrabilinum fyri at geva sjúklinginum neyðuga viðgerð.

Sjúkrahússtjórin hevur nú í áravís gjørt vart við hendan óhepna sjúkraflutning, har sjúklingar úr Suðuroy verða fluttir á sama hátt sum seyður verður, og har sjúkrabilurin má verða burtur av oynni frá tíðliga á morgni til seint á kvøldi. Strandferðslan hevur verið sera fyrikomandi og játta eitt sjúkralugar í erva, men sum ikki slepst til av bildekkinum, eins og teir hava havt samráðingar við havnamyndugleikarnar um at fáa loyvi at seta eina trappu, ið røkkur upp á salongdekkið til skipssíðuna frá tí, at skipið er komið til kai og ein hálvan tíma fram, eins og hálvan tíma áðrenn skipið siglir, og til tað er farið. Men havnamyndugleikarnir í Tórshavn og á Tvøroyri sýta fyri hesum.

Slík landgangstrappa er sum kunnugt á hjólum, og flytir truckur hana lættliga aftur og fram. Hon varð jú nýtt, tá ið Smyril sigldi uttanlands.

Eisini má havast í huga, at nevndu havnir hava stórar fastar inntøkur av Smyrli/Teistanum, eins væl og av vøruflutninginum til og frá Suðuroy. Tí má metast, at hendan sýtanin er sera órímilig, serstakliga tá nevnda landgangstrappa jú kann flytast frá kaikantinum líka so skjótt, sum ferðafólkið er komið í land ella umborð, og tí loyvi eg mær at seta frammanfyri standandi uppskot til samtyktar fram.

1. viðgerð 28. mars 1984. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 3. apríl 1984. Málið fall við 10-0 atkvøðum.

# 108. Uppskot til løgtingslóg um sjómansútbúgving.

Ár 1984, fríggjadagin 23, mars legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið, fram soljóðandi

**Uppskot til**

**løgtingslóg um sjómansútbúgving.**

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at reka skúlar og venjingarskip til fremjing av teimum í § 2 nevndu útbúgvingum.

§ 2. Á sjómansskúlum kann fyrireiking fara fram til hesi prógv:
1) Dugnaskapsprógv,
2) heimaskiparaprógv,
3) skiparaprógv,
4) stýrimansprógv,
5) skipsføraraprógv,
6) radioekspedientprógv,
7) skipskokkaprógv.

Fyrireiking og prógv til dugnaskapsroynd í sigling kann eisini fara fram á øðrum skeiðum eftir góðkenning Landsskúlafyrisitingarinnar.

**lagtingslov om søfartsuddannelse.**

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at drive skoler og øvelsesskib til gennemførelse af de i § 2 nævnte uddannelser.

§ 2. På sømandsskoler kan forberedes til følgende eksaméner:
1) Duelighedsbevis,
2) kystskippereksamen,
3) skippereksamen,
4) styrmandseksamen,
5) skibsførereksamen,
6) radioekspedienteksamen,
7) skibskokkeeksamen.

Forberedelse og eksamen til dueligheds bevis i sejlads kan også finde sted på andre kurser efter godkendelse fra Undervisningsdirektoratet.

**§ 3.** Navigatørútbúgvingin umfatar heilt ella partvís hesar lærugreinir:

arbeiðsleiðsla,
eldsløkking,
føroyskt,
danskt,
enskt,
ravmagnslæra,
elektroteknik,
landalæra,
veður- og streymlæra,
farmaviðgerð,
EDV,
maskinlæra,
alisfrøði,
siglingarlæra,
skipsteknikk og
sjómansskap,
røkning og støddfrøði,
heilsulæra,
sjórætt,
sjóreglur,
signalering,
fiskiskaps- og fiskalívslæra.

Um gongdin ger tað neyðugt, kann landsstýrið áseta, at undirvísing eisini skal fevna um aðrar lærugreinir, ella at onkrar fella burtur.

*2. stk.* Næmingur, ið fyrireikar seg til navigatør, skal fáa ein part av undirvísingini umborð á venjingarskipi undir leiðslu av einum av lærarum skúlans.

**§ 4.** Landsskúlastjórin skipar fyri prógvtøkuni.

**§ 3.** Navigatøruddannelsen omfatter helt eller delvis følgende fag:

arbejdsledelse,
brandbekæmpelse,
færøsk,
dansk,
engelsk,
elektricitetslære,
elektroteknik,
geografi,
vejr- og strømlære,
lastbehandling,
EDB,
maskinlære,
fysik,
navigation,
skibsteknik og sømandsskab,
regning og matematik,
sundhedslære,
søret,
søvejsregler,
signalering,
fiskeri- og fiskeribiologilære.

Såfremt udviklingen nødvendiggør det, kan landsstyret bestemme, at undervisningen også skal omfatte andre fag, eller at nogle bortfalder.

*Stk. 2.* For elever, der forbereder sig til navigatør, skal en del af undervisningen foregå på et øvelsesskib under ledelse af en af skolens lærere.

**§ 4.** Undervisningsdirektøren forestår eksamen.

Løgtingstíðindi 1983 A — 69

2. *stk.* Til prógtøkuna verða havdar skrivligar og munnligar royndir við prógdómarum, sum landsskúlastjórin útnevnir. Prógdómarar í teimum nautisku lærugreinunum skulu hava hægsta nautiska kunnleika.

§ 5. Skiparaprógv og skipsføraraprógv kann bert takast av persóni, ið hevur staðið ávikavist heimaskiparaprógv og stýrimansprógv.

§ 6. Tann, sum hevur staðið stýrimansprógv, verður mettur at hava staðið heimaskipara- og skiparaprógv.

§ 7. Landsstýrið fyriseitur reglur um:
1) treytir fyri upptøku sum næmingur á sjómansskúla,
2) hvussu undirvísingin skal fara fram, lærukrøv og hvørjar lærugreinir undirvísast skal í til tær einstøku prógtøkurnar,
3) prógtøkuhald, herundir høvi til at taka nýggja roynd í ávísum lærugreinum, prógtalsgeving og prógdøming.

§ 8. Landsstýrið kann fyriseta reglur um útbúgving av deksmanning, eftirútbúgving og ískoytisútbúgving av sjófólki.

§ 9. Sjómansskúlarnir skulu hava næmingarnar tryggjaðar

*Stk. 2.* Ved eksamen afholdes mundtlige og skriftlige prøver med censorer, som undervisningsdirektøren udpeger. Censorer i de nautiske fag skal have højeste nautiske uddannelse.

§ 5. Skippereksamen og skibsførereksamen kan kun aflægges af personer, der har bestået henholdsvis kystskippereksamen og styrmandseksamen.

§ 6. Den, som har bestået styrmandseksamen, anses at have bestået kystskipper- og skippereksamen.

§ 7. Landsstyret fastsætter regler om:
1) betingelser for at blive optaget som elev på sømandsskole,
2) undervisningens tilrettelæggelse, pensumkrav og hvilke fag der skal undervises i til de enkelte eksamener,
3) eksamenernes afholdelse, herunder muligheden for at gå op til ny prøve i visse fag, karaktergivning og censur.

§ 8. Landsstyret kan fastsætte regler om uddannelse af dæksmandskab, efteruddannelse og tillægsudddannelse af søfarende.

§ 9. Sømandsskolerne skal forsikre eleverne mod ulykker under

móti óhappi undir sigling við venjingarskipi og á eldsløkkingarskeiði.

**§ 10.** Henda lóg kemur í gildi 1. august 1984, og fara samstundis úr gildi:
lóg nr. 8 frá 19. mars 1954,
lóg nr. 21 frá 28. mars 1956,
lóg nr. 15 frá 25. apríl 1950,
lóg nr. 66 frá 6. september 1963,
lóg nr. 36 frá 28. mai 1965 og
lóg nr. 58 frá 13. mai 1982.

sejlads med øvelsesskib og på brandkursus.

**§ 10.** Denne lov træder i kraft 1. august 1984, og samtidig ophæves:
lov nr. 8 af 19. marts 1954,
lov nr. 21 af 28. marts 1956,
lov nr. 15 af 25. april 1960,
lov nr. 66 af 6. september 1963,
lov nr. 36 af 28. maj 1965 og
lov nr. 58 af 13. maj 1982.

**Viðmerkingar:**
Tann núgaldandi lógin um sjómansskúlaútbúgving er frá 1954 við seinni broytingum. Hon hevur leingi verið óttíðarhóskandi, og hevur eisini innan fyri tey seinastu 10 árini tvær ferðir verið roynt at fáa nýggja lóg fyri hetta økið, uttan at tað tó hevur eydnast, sí løgtingstíðindi 1973 A, bls. 284, 1973 B, skjal 14 og 1977 A, bls. 422 ff.

Sum kunnugt var við løgtingslóg nr. 58 frá 2. oktober 1978 øll skúlaumsiting í landinum løgd undir Landsskúlafyrisitingina, og hevur tað víst seg at vera torført at fáa reglurnar í sjómansskúlalógini at samsvara við reglurnar fyri undirvísingarverkið. Hetta, saman við at lógin eisini á øðrum økjum er ring fyri ikki at siga vónleys at arbeiða við, gjørdi, at Landsskúlastjórin, eftir samráðing millum landsstýrið og Føroya Sjómansskúla í december 1982 setti eina nevnd at gera uppskot til nýggja sjómansskúlalóg.

Nevndin hevur arbeitt við málinum og hevur gjørt hjálagda álit við uppskoti um nýggja lóg, sí skjal 1.

Um uppgávuna hjá nevndini og samansetingina av henni verður víst til álitið, bls. 1. Álitið hevur verið til viðgerðar í Landsskúlaráðnum, sum tekur undir við nýggja lógaruppskotinum, og hevur landsstýrið síðani samtykt at leggja uppskotið fyri tingið.

Hvat viðvíkur innihaldinum í uppskotinum, verður vist til álitið frá nevndini.

1. viðgerð 28. mars 1984. Málið varð beint í skúlanevndina, sum 8. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 23. mars 1984 og undir 1. viðgerð 28. mars 1984 beint í skúlanevndina.

Skúlanevndin hevur á fundi 4. og 7. mai 1984 viðgjørt málið og nevndin tekur undir við uppskotinum og mælir til at samtykkja upskot landsstýrisins við hesi broyting:

Í § 2 verða orðini: »Fyrireiking og prógv til dugnaskaparroynd í sigling kann eisini fara fram á øðrum skeiðum eftir góðkenning Landsskúlafyrisitingarinnar«.

broytt til

| | |
|---|---|
| Fyrireiking og prógvtøka til dugnaskaparroynd í sigling og læruskeið til heimaskipararoynd kunnu eisini fara fram á øðrum skeiðum eftir góðkenning frá Landsskúlafyrisitingini. | Forberedelse og eksamen til duelighedsbevis i sejlads og kursus til kystskippereksamen kan også finde sted på andre kurser efter godkendelse fra Undervisningsdirektoratet. |

Samstundis ger nevndin vart við, at spurningurin um skipskokkaútbúgving, sum nevndur í arbeiðssetninginum (kommisorium) hjá nevndini, sum hevur gjørt uppskotið til nýggja lóg um sjómansútbúgving, ikki er viðgjørdur, men einans nevndur í § 2. Sama er at siga um radioekspedientprógvið.

Nevndin er ikki greið yvir, um tað kann koma undir tað, sum nevnt verður í § 8 í lógaruppskotinum.

Eisini verður nevnt í arbeiðssetninginum, at nevndin skuldi taka til umhugsan spurningin um sjófartsskúlaútbúgving (Praktiska) og møguliga koma við uppskoti. Hetta er eisini umrøtt í nevndararbeiðinum, men var semja um, at hetta eigur at verða gjøllari kannað, og kom nevndin ikki við nøkrum uppskoti um hetta.

Skúlanevndin metir, at arbeitt eigur at verða víðari við hesum máli og mælir tí nevndin tinginum til at samtykkja soljóðandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið mælir nevndini til at arbeiða víðari við spurninginum um sjófartsútbúgving og koma við uppskoti.

2. viðgerð 8. mai § 1 varð samtykt við 23-0 atkvøðum, broytingaruppskot frá skúlanevndini til § 2 samtykt við 21-0, §§ 2-9 samtyktar við 23-0, § 10 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 23-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar samtykt við 23-0 atkvøðum.

3. viðgerð 9. mai. Málið endaliga samtykt við 32-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1629-1-3. Lóg nr. 65 frá 5. juni 1984.

---

# 109. Broyting í reglunum um val av nevndarlimum í P/f Flogsamband.

Ár 1984, fríggjadagin 23. mars legði Finnbogi Isaksen, løgtingsmaður fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

1. Løgtingið áleggur løgtingsformanninum beinanvegin at skipa fyri at aðalfundur verður í P/f Flogsamband beinanvegin.
2. Løgtingið velur við lutfalsvali teir almennu nevndarlimirnar í P/f Flogsamband, fyrstu ferð á fyrstkomandi aðalfundi.
3. Teir almennu nevndarlimirnir í P/f Flogsamband skuldu vera løgtingsmenn.

**Viðmerkingar.**
Eftir at løgtingið 4. mai 1968 hevði samtykt at seta partapening í

P/f Flogsamband, valdi landsstýrið teir fýra almennu nevndarlimirnar.

Av tí at nevndin eftir samráðingar í Keypmannahavn tóktist hava góðar møguleikar fyri at fáa flogferðsluna til og úr Føroyum á føroyskar hendur, samtykti tingið eftir uppskoti frá fíggjarnevndini, at løgtingið skuldi veja hesar nevndarlimir.

Úrslitið av hesum varð, at felagið gavst við royndunum at yvirtaka flogferðsluna. Einstakir fundir hava tó verið millum Flogsamband og SAS, men hesir hava bert endað í rokið.

Nevndin í felagnum hevur virkað sera illa hesi árini, men hon hevur kortini syrgt fyri at gjalda sær sjálvari løn. Hafturímóti hevur tað mangan gingið striltið hjá henni at halda árligan aðalfund. Seinasti vanligi aðalfundur, sum varð fráboðaður partafelagsskrásetingini var 3. februar 1982, t.v.s. at tveir aðalfundir áttu at havt verið síðani.

Skipanin hevur verið, at løgtingsformaðurin hevur umboðað løgtingið á aðalfundi. Tí verður skotið upp, at løgtingsformaðurin syrgir fyri, at aðalfundur verður hildin alt fyri eitt, og at nýggir almennir nevndarlimir verða valdir tá.

Uppskotsstillarin metir, at løgtingið hevur betri møguleikar at ansa eftir, at nakað veruligt hendir í flogmálinum, um so er at teir almennu nevndarlimirnir eru løgtingsmenn.

Annars verður víst til løgtingsmál nr. 10/1969: Uppskot til samtyktar viðv. flogmálinum. Serliga verður víst til pkt. 2 á síðu 73.

1. viðgerð 27. mars 1984. Málið varð beint í serliga 6-mannanevnd.

28. mars 1984 vórðu hesir valdir í nevndina: Finnbogi Isaksen, Flemming Mikkelsen, Jógvan Sundstein, Jóannes Dalsgaard, Hilmar Kass og Adolf V. Hansen.

# 110. Umsiting av yvirtiknum málsøkjum.

Ár 1984, mikudagin 23. mars legði Karin Kjølbro, løgtingslimur fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum at átaka sær umsitingina av yvirtiknum málsøkjm, sum ríkismyndugleikarnir umsita í Føroyum.

**Viðmerkingar:**
Seinastu árini hevur rættiligur ruðuleiki tikið seg upp viðvíkjandi sermálum og felagsmálum. Landsstýrið hevur t.d. lagt mál fram á ting, ið hildin hava verið føroysk sermál. Men tá tað er komið á tingborð, hevur danski ríkisumboðsmaðurin mótmælt og steðgað.

Ikki er orsøk til at finnast at framferð ríkisumboðsmansins, bert ger hann skyldu sína sum embætismaður.

Heldur eigur hetta at geva okkum nakað at hugsa um.

Tjóðveldisflokkurin hevur við einfaldgering, stýring og størri sjálvstýri fyri eyga lagt uppskot fram á ting, eitt nú um donsku peningaveitingarnar, ið ganga eftir 72 ymiskum skipanum.

Eisini hevur tjóðveldisflokkurin lagt uppskot fram á ting um yvirtøku av umsitingini av Føroya Kirkjugrunni, ið hoyrir undir heimastýrið og verður fíggjaður av føroyingum, men umsitin av ríkisumboðsskrivstovuni í Føroyum.

Hetta uppskot fall á tingi.

Vanligt er, at yvirtikin málsøki verða umsitin av landsstýrinum við heimildum í løgtingslógum, men undantøk eru. T.d. verða fiskimenn mynstraðir hjá landfútanum ella sýslumonnunum. Skrásetingina av motorakførum og skipum hevur landfútin í hondum, og sorinskrivarin stendur fyri tinglýsingini og er yvirformyndarí. Onnur

dømi kundu verið nevnd um ørkymlandi umsitingina, eitt nú tá talan er um børn, fødd uttan fyri hjúnalag. Avgreiðsla av faðirskapsmálum fer fram á fútaskrivstovuni.

Eisini hetta hevur Tjóðveldisflokkurin til fánýtis roynt at fáa broytt.

Sum er tykjast menn at vera vorðnir meira greiðir yvir ruðuleikan, og eftir tí, ið kemur fram í bløðunum, so eru eisini nakrir í núverandi samgongu sinnaðir til at bøta um á hesi viðurskifti.

Her kundi verið lagt afturat, at í § 2 í heimastýrislógini, seinasta punktum, stendur:

»På tilsvarende måde er hjemmestyret *forpligtet* til at overtage sager og sagsområder, der er opført på listen, når det ønskes af Rigsmyndighederne.«

Samanumtikið má sigast, at tað er sera rangvørgt, at ríkismyndugleikin umsitur føroysk málsøki í Føroyum.

1. viðgerð 28. mars 1984. Málið varð beint í lóganevndina, sum 8. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 23. mars 1984 og undir 1. viðgerð 28. í s.m. beint í lóganevndina.

Nevndin hevur tann 30. apríl viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Asbjørn Joensen, Arne Ziskasen, Agnar Nielsen og Jákup Lindenskov) setir einki uppskot fram, meðan minnilutin (Petur Reinert) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 8. mai. Uppskotið til samtyktar fall við 7-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 101-12.

# 111. Revsing fyri skeiva uppgávu til skattavaldið.

Ár 1984, fríggjadagin 26. mars legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið tekur til umrøðu spurningin um revsing fyri skeiva uppgávu til skattavaldið.

**Viðmerkingar:**
Tingið hevur gjøgnum árini brúkt nógva orku og nógva tíð upp á at gera skattareglurnar viðvíkjandi lønmóttakarum so einklar sum møguligt, solciðis at hesir í ógvuliga ríkiligan mun gjalda sín skatt í dag eftir lógum, sum ikki geva møguleika fyri nøkrum fráviki í skattgjaldingini.

Lógirnar eru rættiliga greiðar og løunmóttakarin í samfelagnum má vera tann parturin av fólkinum, sum í dag verður harðast og mest effektivt skattaður. Við nýggju kelduskattaskipanini fáa vit nú haraftrat ein beinleiðis innkrevjingarhátt, sum er bygdur specielt til henda bólk av samfelagsborgarum. Hvussu henda skipan fer at virka, kann sjálvandi vera stórur ivi um, men tað er rættiliga greitt, at øll tey, sum koma at liggja innanfyrti hesa skipan, t.v.s. tey, sum koma at fáa løn sína goldna gjøgnum peningastovnarnar, har verður skatturin tikin av, áðrenn lønmóttakarin kann nýta nakað av peningi.

Men tað er eitt rættiliga stórt tal av fólki í Føroyum, sum kemur at fáa sína úrtøku uttanum peningastovnarnar. Her verður hugsað um m.a. spekulantveldi. Tá nú endaliga skal gerast upp fyri hesar bólkar, einaferð í 1985, so er vert at vita, hvat hendir, um skeivt verður uppgivið? Hetta við vilja ella av ósketni.

Tað má vera eitt ella annað samsvar ímillum tann straff, ein fær og gerðina, ið gjørd verður.

Hyggja vit at teimum skipanum, ið eru galdandi í øðrum londum, so hevur ein t.d. í Danmark eitt skattavald, ið gevur bót fyri skattasvik, um tað so er við vilja ella við óvilja, og um hetta svik er grovari enn eitt vist, so verður tað sent til ákærumyndugleikarnar við kravi um hefti. Vit meta, at tað er neyðugt at fáa eina munandi skerping í lógunum fyri skattasvik fyri at tryggja, at ikki ov mikið av peningi fer uttanum landskassan ella uttanum kommunukassarnar.

Javnaðarflokkurin metir, at nú tingið hevur gjørt eitt stórt lóggávuarbeiði, ið umfatar so at siga bert ein samfelagsbólk — lønmóttakarar — so er skylda tingsins at viðgera viðurskifti og lóggeva fyri aðrar bólkar. Herundir eisini spekulantveldi, ið má haldast at hava alt ov leysar teymar í teimum skattaskipanum, vit hava í dag.

1. viðgerð 3. apríl 1984. Málið varð beint í skattanevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fyri tingið tann 26. mars 1984 av Javnaðarflokkinum og varð undir 1. viðgerð beint í skattanevndina. Skotið verður upp, at spurningurin um skeiva uppgávu til skattavaldið skal verða tikin til umroðu á løgtingi.

Revsireglur fyri at geva rangt upp o.a. og eftirgjalding av ov lítið goldnum skatti og revsireglur annars eru viðgjørdar í kapitli 14 í skattalógini (samtíðarskattur).

Undir viðgerðini av samtíðarskattalógini í mai 1983 spurdi nevndin seg fyri hjá landfútanum viðvíkjandi revsireglunum í kapitli 14. Fútin metti, at kapittul 14 ikki var í tráð við nýggjar lógartekniskar tankar.

Meirilutin í nevndini kundi taka undir við hesi uppfatan, men mælti kortini til at samtykkja kapittul 14 so sum skotið upp av landsstýrinum.

Samstundis setti meirlutin fram soljóðandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt at leggja fram broytingaruppskot til kapittul 14 í samtíðarlógaruppskotinum, um revsiásetanir í ólavsøkutingsetuni 1983.

Tá nevnda broytingaruppskot enn ikki er komið frá landsstýrinum, setir ein samd nevnd fram soljóðandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um sum skjótast at leggja fram broytingaruppskot til kapittul 14 í skattalógini fyri tingið.

2. viðgerð 7. mai. Uppskotið frá nevndini samtykt við 28-0 atkvøðum.

---

# 112. Uppskot til samtyktar um føroyska heilsuverkið.

Ár 1984, fríggjadagin 26. mars legði Petur Reinert, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Føroya Løgting viðtekur, at beinanvegin verður farið undir fyrireikingar at yvirtaka alla umsiting av øllum heilsuverkinum og skipa Heilsuráð Føroya.

**Viðmerkingar:**
Viðvíkjandi heilsuverki okkara er tað so, at enn hava vit bert umsitingina av tí partinum av heilsuverki okkara um hendur, sum snýr seg um sjúkrahúsverkið.

Hin parturin av heilsuverkinum er enn fyri største partin undir danskari umsiting — ríkisumboðnum — og yrkisliga undirlagdur danska »Sundhedsstyrelsen«.

Fyri alrastørsta partin er hetta tann »primera« heilsutænastan: kommunulæknar, ljósmøður, heilsusjúkrasystrar, skúlasjúkrasystrar, skúlalæknar o.o., og hin stjórnandi parturin: Landslæknastovnurin.

Vit eiga væl útbúgvið fólk at umsita hetta málsøki. Og tað er eyðsýnt, at á hesum øki tørvar nýskipan og nýhugsan. Skipast má so fyri, at alt heilsuverkið, sum er, virkar sum ein heild eftir føroyskum fortreytum og føroyskum tørvi.

Sum nú er, eru partar av primeru heilsutænastuni skipaðir eftir avoldaðum reglum, meðan nýggir stovnar hava tikið seg upp, uttan hugsað hevur verið um tillaging eftir føroyskum viðurskiftum. Hetta hevur ført við sær, at samskipanin ymsu stovnanna millum hevur verið so leys, at hon hevur verið til bága fyri samstarvið og arbeiðið sum heild.

Eitt tað fyrsta, sum eigur at verða gjørt í hesum føri er, at føroyska landslæknastovnin og síðan skipa føroyskt heilsuráð sum ovasta myndugleika í føroyskum heilsuspurningum.

Heilsuverkið gerst tá føroyskt, verður bíligari at reka, lættari verður at samskipa teir ymsu stovnarnar til frama fyri Føroya fólk.

1. viðgerð 3. apríl. Málið varð beint í sjúkrahúsnevndina og er ikki komið aftur hagani.

# 113. Gerð av ferjulegu inni á Sundi v.m.

Ár 1984, fríggjadagin 26. mars legði Petur Reinert, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum

1. beinanvegin at fara undir gerð av nýggjari ferjulegu inni á Sundi til rutusiglingina inn á Skálafjørðin.
2. at gera kanningar um í hvønn mun Tróndur tá er hóskandi far til hesa sigling.
   Vísa hesar kanningar og metingar, at so er ikki, leggur landsstýrið á ólavsøku uppskot fyri tingið um fíggjan og bygging av nýggjari ferju til hesa sigling.

**Viðmerkingar:**
Spurningurin um at byggja ferjulegu inni á Sundi til siglingina inn á Skálafjørðin hevur ofta verið havdur á máli. Tað er nú ikki so heilt stutt síðan, at landsstýrismaðurin Páll Vang umrøddi hesa ferjulegu og segði, at kanningar og projekteringar vóru so gott sum lidnar.

Hvønn týdning henda ruta hevur fyri fólkið, sum býr við Skálafjøðin er óneyðugt at greiða frá, hjá mongum er hon dagligi vegurin til og frá arbeiði ella skúlagongd. Og hvussu ofta henda farleið er einasta trygga farleið um veturin hjá eystringum og norðingum er eisini óneyðugt at greina.

Verður ferjulega gjørd á Sundi, verður henda farleið nógv minni ótespilig, tryggari og ikki minst nógv stytri.

At henda farleið eisini vildi fingið stóran týdning fyri ídnaðarmenn í Eysturoynni er heldur eingin ivi.

Nú Leirvíksbergholið verður liðugt um stutta tíð, verður ferjufarleiðin millum Skálafjørðin og Streymoynna at fáa nógv størri týdning enn áður, hesum er einki at ivast í.

1. viðgerð 3. apríl 1984. Málið varð beint í vega- og havnanevndina, sum 7. mai legði fram soljóðandi

## ÁLIT

Málið varð lagt fram av Peturi Reinert hin 26. mars 1984 og undir 1. viðgerð hin 3. apríl 1984 beint í Vega- og Havnanevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Páll Vang, landsstýrismann, har hann greiddi frá, at landsverkfrøðingurin eina tíð hevur arbeitt við at fyrireika gerð av nýggjari ferjulegu til siglingina Skálafjørðin/Suðurstreymoy.

Eitt nú hevur verið kannað, hvar ferjulegan frægast liggur og eru í hesum sambandi botnkanningar gjørdar frá Hvítanesi niðan móti Sundi. Í næstum verða samráðingar millum Tórshavnar býráð og landsmyndugleikarnar um málið.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sv. Åge Ellefsen, Eli Nolsøe, Frederik Olsen og Johs. Martin Olsen) vísir í fyrsta lagi á, at løgtingið áður hevur samtykt at gerast skal ferjulega inni á Sundi, og í øðrum lagi ásannar meirilutin, at tað fyrireikandi arbeiðið enn ikki er lokið. Meirilutin kann sostatt ikki taka undir við uppskotinum, sum áleggur landsstýrinum beinan vegin at fara undir gerð av nýggjari ferjulegu.

Hinvegin heitir meirilutin á landsstýrið um at arbeiða dúgliga við málinum, so tað kanu fáa eina skjóta loysn.

Minnilutin (Hans Marius Joensen, Ingrid Sondum og Hilmar Bech) tekur undir við uppskotinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 8. mai. Pkt. 1 fall við 12-0 og pkt. 2 fall við 14-0.

F.L.j.nr. 1811-29.

# 114. Løgtingslóg um vørulýsing (vørudeklaratión).

Ár 1984, fríggjadagin 26. mars legði Petur Reinert, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um vørulýsing (vørudeklaratión).**

§ 1. Allur úrdráttur úr fiski og øðrum matdýrum úr sjónum, sum er ætlaður til útflutnings, verður nágreiniligari vørulýsing (deklaratión) sum útflytarin letur framleiðaranum, áðrenn vøran verður tilvirkað.

§ 2. Álagt verður øllum útflytarum av nevndu vørum eisini at lata vrakieftirlitinum tær vørulýsingar, sum framleiðararnir fáa at arbeiða eftir.

§ 3. Álagt verður framleiðarunum at fylgja vørulýsingini og lúka allar treytir hennara og boða vrakieftirlitinum frá, áðrenn vøran verður útflutt, og nær hetta kann verða.

**lagtingslov om varedeklaration.**

§ 1. Alle produkter af fisk og andre dyr fra søen til konsum, som er beregnet til udførsel, skal være ledsaget af en nøjagtig varedeklaration, som eksportøren overlader producenten, inden varen bliver tilvirket.

§ 2. Pålagt bliver alle eksportører af ovennævnte varer også at give vragerinstitutionen de vareoplysninger, som producenterne får at arbejde efter.

§ 3. Pålagt bliver producenterne at følge varedeklarationen og opfylde alle dens betingelser og underrette vragerinstitutionen, inden varen bliver eksporteret, og når dette kan finde sted.

**§ 4.** Álagt verður vrakieftirlitinum at kanna, um vørulýsingin er fylgd, áðrenn vøran verður flutt av landinum.

**§ 5.** Er vøran ikki í samljóð við vørulýsingina, verður bann sett fyri útflutningi.

**§ 6.** Heimilað verður landsstýrinum at gera neyðuga reglugerð fyri virki vrakieftirlitsins í hesum arbeiði .

**§ 7.** Brot á hesa lóg koma undir revsing.

**§ 8.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin

**§ 4.** Pålagt bliver vragerinstitutionen at undersøge om varedeklarartionen er efterfulgt, inden varen bliver eksporteret.

**§ 5.** Er varen ikke samsvarende varedeklarationen, bliver forbud sat for eksport.

**§ 6.** Landsstyret bliver bemyndiget til med bekendtgørelse at sætte regler for vragerinstitutionens arbejde vedrørende disse forhold.

**§ 7.** Brud på disse lovregler kommer under straf.

**§ 8.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Fleiri ferðir í hesum tingskeiði hevur tjóðveldisflokkurin roynt at skorða á landsstýrið at bera so í bandi, at vit fingu betri útflutningsvørur, so landið ikki kom undir teir stóru peningsmissir, sum vit ofta hava verið fyri av vantandi góðsku av útfluttum fiskavørum. Eisini hevur verið hildið verið neyðugt at skorða á og hjálpa til aftur at skapa føroyskum fiskavørum tað góða navn og góða umdømi, sum hesar vørur áttu fyri dygdir fram um aðrar.

Men allar royndir hava tíverri verið til fánýtis.

Flestu uppskot hava tíverri ikki fingið nóg góða undirtøku á tingi. Í besta føri er áheitan komin frá fiskivinnunevndini -- ella einum meiriluta har — at heita á landsstýrið um at gera nakað við hesi viðurskifti. Og harútí er tað so komið. Frá landsstýrinum er einki komið, sum hevur ført til nakra betring í hesum týðandi spurningi.

Vert er at minna á tingsins viðtøku á vári 1982 um at »heitt verður á landsstýrið um at skipa soleiðis fyri at endurskoða lóggávuna viðvíkjandi vraking av øllum fiski og fiskaúrdráttum«. Her er so einki hent.

Somu lagnu fingu uppskot Tjóðveldisfloksins um: Broyting í løgtingslóg um fiskavraking, sum varð framlagt 16. september 1982 og um: Setan av nevnd at kanna orsøkirnar til endurgjaldskrøv fyri vantandi góðsku av útfluttum fiskavørum, sum varð framlagt 30. november 1982.

Her er so aftur ein roynd at fáa okkara ting at taka stig til at betra góðskuna av fiskaúrdráttum okkara til útflutnings. Øll vita, at er rávøran ikki í lagi, og hevur framleiðarin (fiskavirkið) ikki fylgt teim forskriftum, sum keyparin hevur sett sum treyt fyri ávísum fiskavørum, kann hetta fáa álvarsligar fylgjur. Tað er eisini almannakunnugt, at meðan hvør stertur, sum kemur í salt, verður vrakaður áðrenn hann verður pakkaður, hevur vrakieftirlitið einki at gera við tær vørur, sum ikki verða saltaðar, t.d. frystir fiskaúrdráttir. Tí kunnu fleiri frávik frá keyparanna krøvum vera fjald fyri mannaeygum til tann dag, keyparin kannar vøruna, ella tað sum verri er, at vøran kemur í ytsta keyparaliðið, og har fær so ringt orð á seg, at tað kann skapa trupullleikar fyri at vøran yvirhøvur kann seljast aftur, kanska í besta føri til nógv lægri prísir.

Í seinasta enda vil hetta ávirka fiskaprísiruar heima hjá okkum sjálvum.

Lógaruppskotið miðar ímóti at skapa trygd fyri, at allar føroyskar útflutningsvørur úr fiski eru fult í samljóði við og lúka tær treytir, sum keyparin hevur sett fyri hvørja einstaka vøru.

Betur er, at vøra, sum ikki lýkur treytirnar, sum ásettar eru, als ikki fer av landinum, heldur enn at hon kann ørkymla marknaðin fyri føroyskum fiskavørum sum heild.

Uppskotið miðar ímóti, at allir fiskaúrdráttir verða kannaðir av vrakieftirlitinum, áðrenn teir fáa úrflutningsloyvi. Ikki verður kanska neyðugt at kanna hvønn pakka, men vandaliga eigur at verða farið um, í hvussu so er í fyrstuni.

Hetta krevur væl fyriskipað arbeiði av vrakieftirlitinum, og arbeiðið er stórt sæð nýtt. Tí krevur hetta meira fólk, og betri skúling av vrakieftirlitsmonnum okkara. Tjóðveldisflokkurin vil tí, tá fíggjarlógin kemur til viðgerðar, seta uppskot um at hækka upphæddina til vrakieftirlitsstovnin. Eftir okkara tykki eru møguleikar fyri at fáa hesa upphædd margfaldaða aftur í betri útflutningsvørum og hægri fiskaprísum.

1. viðgerð 3. apríl 1984. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av Tjóðveldisflokkinum 26. mars 1984 og við 1. viðgerð tann 3. apríl beint í fiskivinnunevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Øssur Dam Jacobsen, Fredrik Olsen, Juul Jacobsen og Jógvan I. Olsen) førir fram, at løgtingið í apríl 1982 samtykti at heita á landsstýrið um at skipa soleiðis fyri, at vit fáa eina javna góðskumeting kring landið, og at endurskoða lóggávuna viðvíkjandi vraking av øllum fiski og fiskaúrdráttum.

Nevndin hevur fingið at vita, at landsstýrið arbeiðir við málinum, og hevur m.a.a samtykt at seta ein bólk at arbeiða við málinum og kotna við tilmæli um uppskot, sum fevnir um hetta málsøki, og setir sostatt einki uppskot fram.

Minnilutin (Hans M. Joensen og Tórálvur M, Olsen) mælir til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 7. mai. § 1 fall við 13-0.

---

# 115. Ferðamannamiðstøð.

Ár 1984, mánadagin 26. mars legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

# Uppskot

# til

## løgtingslóg um ferðamannamiðstøð.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at stovna eina ferðamannamiðstøð.

§ 2. Uppgávurnar hjá ferðamannamiðstøðini eru m.a. hesar:

1) at gera skipanir og ætlanir viðvíkjandi føroysku ferðamannavinnuni,
2) at upplýsa um Føroyar bæði innan- og uttanlands,
3) at hjálpa og vegleiða ferðafólki, íroknað blaðmonnum, ið koma til landið,
4) veita hjálp til áhugafelagsskapir kring landið, herundir stovnseting av avgreiðslum, har tað tykist neyðugt,
5) at fyriskipa upplæring av starvsfólki í ferðamannatænastuvirksemi,
6) at hava neyvt samstarv við jarðaeigarar og friðingarmyndugleikar við tí endamáli, at náttúru- og mentunnarvirði ikki verða skemd ella fara fyri skeyti av tí virksemi, ferðamannastreymurin hevur,
7) at leggja til rættis útferðir, vitjanir o.a. ítriv fyri ferðafólk,

## lagtingslov om turistcentral.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at etablere en turistcentral.

§ 2. Centralens opgaver er bl.a. følgende:

1) at udføre forskrifter og planer vedrørernde det færøske turisterhverv,
2) at give oplysninger om Færøerne både inden- og udenlands,
3) at yde turister og journalister der ankommer her til landet, hjælp og vejledning.
4) yde assistance til interessegrupper rundt i landet, herunder etablering af ekspeditioner, hvor det synes nødvendigt,
5) at forestå oplæring af personale inden for turisterhvervet,
6) at have nært samarbejde med jordejere og fredningsmyndigheder med det formål at undgå at turiststrømmen kommer til at skæmme eller ødelægge natur- eller kulturværdier,
7) at planlægge udflugter, besøg o.a.fritidsbeskæftigelse for turister,

8) at skráseta og skipa sølur av gistingarplássum og samskipa hetta virksemi við lokalar avgreiðslur og ferðamannastovur,
9) at virka fyri at tað til eina og hvørja tíð er nóg mikið av rúmligum gistingar- og matstovuhentleikum, bæði í dygd og nøgd,
10) at geva tilmæli til avvarðandi myndugleikar/stovnar/virkir um flutningsspurningar, umhvørvisspurningar, mentunartiltøk, fíggjartiltøk og á øðrum økjum, ið hava við fremmandavitjanir at gera,
11 at gera vegleiðingar og geva upplýsingar um, hvar og hvussu fólk kunnu ferðast ella støðast.

§ 3. Fyri miðstøðini situr stýri við 5 limum, ið verður valt soleiðis:
Føroya Kommunufelag 1,
Tórshavnar kommuna 1,
Gistingarhúseigarar 1,
Ferðamannafeløgini 1,
Føroya landsstýri 1, og er hesin formaður. Fæst ikki semja um val av limi, verður hann tilnevndur av landsstýrinum. Fyri hvønn av limunum verður valdur tiltakslimur. Valið er galdandi fyri 4 ár í senn.
*2. stk.* Stýrið er hægsti myndugleiki fyri miðstøðini og hevur ábyrgdina av virkseminum hjá støðini.

8) at registrere og forestå salg af overnatningspladser og samordne denne virksomhed med lokale ekspeditioner og turistbureauer,
9) at arbejde for at der til enhver tid er tilstrækkeligt med rummelige overnatnings- og spisefaciliteter, både hvad kvalitet og antal angår,
10) at give anbefaling til vedkommende myndigheder/institutioner/virksomheder om transportspørgsmål, miljøspørgsmål, kulturarrangementer, financieringsordninger og på andre områder, der har med turisme at gøre,
11) at udfærdige vejledninger og meddele oplysninger om, hvor og hvorledes folk kan færdes og opholde sig.

§ 3. Centralen ledes af en bestyrelse med 5 medlemmer, der vælges således:
Færøernes Kommuneforening 1,
Torshavn Kommune 1,
Hotelejere 1,
Turistforeningerne 1,
Færøernes landsstyre 1, og er denne formand. Opnås ikke enighed om valg af et medlem, udpeges dette af landsstyret. For hvert medlem udpeges en suppleant. Valget gælder for 4 år ad gangen.
*Stk. 2.* Bestyrelsen er højeste myndighed for centralen og har ansvaret for centralens virksomhed.

**§ 4.** Stovnað verður eitt ráðgevandi umboðsmannaráð við hægst 20 limum, ið umboða áhugamálini hjá ferðamannavinnuni.
*2. stk.* Landsstýrið avger hvørji feløg, fyritøkur og stovnar hava rætt til at skjóta upp limir til umboðsmannaráðið.
*3. stk.* Umboðsmannaráðið skipa seg sjálvt.
*4. stk.* Valið er galdandi í 4 ár í senn. Nevndin ella umboðsráðsformaðurin innkallar umboðsmannaráðið til fundar í minsta lagi eina ferð um árið og annars so ofta, sum hetta verður mett neyðugt.

**§ 5.** Landsstýrið setir eftir ummæli frá stýrinum stjóra, ið tekur sær av dagliga rakstrinum.
*2. stk.* Stjórin tekur lut í øllum stýris- og umboðsráðsfundum uttan slíkum, sum hava við hansara persónligu viðurskifti at gera.

**§ 6.** Útreiðslurnar av ferðamannamiðstøðini verða goldnar úr landskassanum.
*2. stk.* Løn til stjóra og starvsfólk og samsýningar til nevndarlimir skulu góðkennast av landsstýrinum.

**§ 7.** Tær gjøllaru reglurnar fyri miðstøðina, sum tørvur skuldi verið á, setir landsstýrið.

**§ 4.** Der nedsættes et rådgivende repræsentantskab med højst 20 medlemmer, der repræsenterer turisterhvervets interesser.
*Stk. 2.* Landsstyret afgør hvilke foreninger, virksomheder og institutioner, der har ret til at foreslå medlemmer til repræsentantskabet.
*Stk. 3.* Repræsentantskabet konstituerer sig selv.
*Stk. 4.* Valget gælder for 4 år ad gangen. Bestyrelsen eller repræsentantskabets formand indkalder repræsentantskabet til møde mindst en gang årlig og ellers så ofte, som dette anses for nødvendigt.

**§ 5.** Landsstyret ansætter efter bestyrelsens udtalelse en direktør, der varetager den daglige drift.
*Stk. 2.* Direktøren deltager i alle bestyrelses- og repræsentantskabsmøder med undtagelse af sådanne, der vedrører hans personlige forhold.

**§ 6.** Turistcentralens udgifter afholdes af landskassen.
*Stk. 2.* Lønninger til direktør samt personale og vederlag til bestyrelsesmedlemmer skal godkendes af landsstyret.

**§ 7.** De nærmere bestemmelser for centralen, der måtte vise sig at være nødvendige, fastsættes af landsstyret.

§ 8. Stýrið skal á hvørjum ári innan 1. apríl senda landsstýrinum eina frágreiðing um

a) ferðamannavinnuna og virksemið hjá miðstøðini í farna ári og
b) hvørji tiltøk eiga at verða sett í verk til frama fyri ferðamannavinnuna.

§ 9. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 8. Bestyrelsen skal hvert år inden 1. april sende landsstyret en beretning om

a) turisterhvervet og centralens virksomhed i det forløbne år og
b) hvilke foranstaltninger der bør iværksættes til fordel for turisterhvervet.

§ 9. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Í 1982 setti landsstýrið eina nevnd at gera kanningar av turismuni í Føroyum og herútfrá gera metingar um, hvussu henda vinna, sum seinastu árini er vorðin ein alt størri táttur í dagliga lívinum, eigur at verða handfarin.

Sum fastar limir í nevndina valdi landsstýrið:

Trygva Johansen, sendifulltrúa, nevndarformaður,
Lars Larsen, stjóra,
Sigurd Simonsen, ferðamannastjóra,
Tummas Arabo, projektleiðara, og
Jákup Haraldsen, landsapotekara.

Til hjálpar hevur nevndin havt eit ráðgevandi umboðsmannaráð við 22 limum, umboðandi stovnar, virkir, feløg v.m., sum ein metti at hava samabnd við ferðamannavinnuna.

Í oktober 1983 handaði nevndin landsstýrinum álit um føroysk ferðamannaviðurskifti.

Í álitinum, sum samstundis við framløguni av hesum máli er býtt út til tinglimirnar, hevur nevndin savnað saman stórt tilfar til lýsing av málinum og sett fram ymisk uppskot um neyðugar ábøtur til frama fyri ferðamannavinnuna, herundir stovnan av ferðamannamiðstøð.

Landsstýrið tekur undir við uppskotinum um stovnan av ferðamannamiðstøð og setir fram uppskot til lóg um stovnan av ferðastøð, sum skal taka sær av inngangandi turismu. Støðin skal sostatt ikki virka sum nøkur ferðamannastova fyri útgangandi ferðing.

Kostnaðurin av ferðamannamiðstøðini verður mettur til 1,2 mió. kr., men her frá skal dragast ein partur av tí studningi, sum nú verður goldin til Føroya Ferðamannafelag fyri uppgávur, sum ferðamannamiðstøðin kemur at taka sær av.

1. viðgerð 3. apríl. Málið varð beint í vega- og havnanevndina, sum 7. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 26. mars 1984 og undir 1. viðgerð 3. apríl beint í Vega- og Havnanevndina.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin fingið skriv við áheitan frá M.B.F. (Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum) um at teimum unnist at fáa lim í stýrið fyri miðstøðina. Vega og Havnanevndin er sinnað at ganga umsóknini frá M.B.F. á møti.

Ein samd nevnd tekur undir við uppskotinum, men setir fram soljóðandi

**broytingaruppskot**

til uppskot landsstýrisins:

Í § 3 verður 1. punktum orðað soleiðis:
»Fyri miðstøðini situr stýri við 7 limum, ið verða valdir soleiðis:
Føroya kommunufelag 1,
Tórsbavnar kommuna 1,
Gistingarhúseigarar 1,
Ferðamannafeløgini 1,
Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum 1,
Samferðslunevndin 1,
Føroya Landsstýri 1 og er hesin formaður.«

I § 3 affattes 1. punktum således:
»Centralen ledes af en bestyrelse med 7 medlemmer, der vælges således:
Færøernes kommuneforening 1,
Torshavn kommune 1,
Hotelejere 1,
Turistforeningerne 1,
Landsforeningen for handicappede på Færøerne 1,
Samfærdselsudvalget 1,
Færøernes Landsstyre 1 og er denne formand.«

2. viðgerð 8. mai. Broyting frá nevndini til § 1 samtykt við 23-0, §§ 2-8 samtyktar við 23-0, § 9 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. Málið soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð samtykt við 24-0 atkvøðum.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 3005-20-1. Lóg nr. 61 frá 5. juni 1984.

---

# 116. Uppskot til samtyktar um »Veðranesprojektið«.

Ár 1984, fríggjadagin 26. mars legði Jóannes Dalsgaard, løgtingsmaður fram sosljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið tekur til umrøðu spurnin gin um tað sonevnda »Veðranesprojektið«.

**Viðmerkingar:**
Útbyggingarætlanin hjá SEV í Norðureysturoy, ið gongur undir heitinum Eiði 1 og 3 má metast at hava so umfatandi árin á landslag og náttúru, at aðrir útvegir eiga at verða kannaðir.

Hóast allir avvarðandi myndugleikar hava givið tey neyðturviligu loyvi til hetta stóra projekt, so ern so nógvar atfinningar komnar fram frá fakligum síðum eins væl og frá almenninginum sum heild, at tað má metast sum óforsvarligt at lata Eiði 1 og 3 fara í gongd uttan at t.d. »Veðranesprojektið« er viðgjørt av løgtinginum.

Eisini er so nógv nýtt komið fram í øllum hesum máli, at tað helst hevði verið skilagott, um løgtingið einaferð enn umtøddi allan vatnorkuspurningin.

Tað er nógv, sum bendir á, at fólk yvirhøvur eru í stórum iva, hvørt ætlanirnar hjá SEV eru skilagóðar, rentablar og í tráð við ta vaksandi virðing, føroyingar yvirhøvur hava fyri náttúru Føroya.

Eitt orðaskifti um »Veðranesprojektið« kundi kanska bent á aðrar leiðir í øllum orkuspurninginum og tí heldur uppskotsstillarin, at tað hevði gagnað øllum hesum stóra orku- og umhvørvismáli, at tingið tók tað til umrøðu enn einaferð.

1. viðgerð 3. apríl. Málið varð beint í umhvørvisnevndina, sum 7. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av Jóannes Dalsgaard, løgtingsmanni, 23. mars 1984 og undir 1 viðgerð beint í umhvørvisnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 3. mai og vísir til løgtingsmál nr. 96/1983: Størri ávirkan hjá løgtingi og landsstýri á SEV, og setir tí einki uppskot fram.

8. mai legði Jóannes Dalsgaard fram soljóðandi

## broytingaruppskot

## uppskot
## til
## samtyktar

Føroya Løgting samtykkir

1. at nokta SEV at byrja úrbyggingina av Eiði 1 og 3, til Løgtingið hevur havt høvi at taka støðu til »Veðranesprojektið«.

2. at umhvørvisnevndin, sum miðlumtingarnevnd í samstarvi við Orkuráðið kannar Veðranesprojektið og endurskoðar vatnorkuútbyggingarnar hjá SEV og leggur kanningarúrslitið fyri Løgtingið á ólavsøku.

8. mai løgdu tingmenninir Edmund í Garði, Óli Breckmann og Jógvan Sundstein fram soljóðandi

**broytingaruppskot**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

1. Løgtingið áleggur landsstýrinum beinanvegin at samráðast við S.E.V. um at bíða við vatnorkuútbyggingini, til Veðranesprojektið er liðugt kannað av orkuráðnum, og løgtingið hevur tikið støðu til kanningarúrslitið.
2. Løgtingið áleggur landsstýrinum, saman við tí í 1 nevnda kanningarúrsliti, at leggja fyri tingið eintak av sáttmálanum millum S.E.V. og Højgaard & Schultz viðvíkjandi vatnorkuútbyggingini í Føroyum.

**Viðmerkingar:**
Tað skilst á øllum brøgdum, at SEV er tilreiðar, hvønn dag tað skal vera, at byrja grevstrar- og spreingiarbeiði í samband við vatnorkuútbyggingina í Eysturoy tað sokallaða Eiði I og III projektið, sum danska byggifyritøkan Højgaard & Schultz skal útinna móti rokning.

Hetta útbyggingarstigið er tað fyrsta av fleiri, sum tilsamans fara at kosta út móti 1.000 mió. kr.

Uppskotsstillararnir kunnu ikki góðtaka, at útlendingar sleppa at arbeiða fyri 1.000 mió. kr. í Føroyum móti rokning, meðan føroysk byggifeløg als onga trygd hava fyri munagóðari luttøku í vatnorkuútbyggingini, og í besta lagi sleppa at arbeiða eftir tilboðum upp á undirentreprisur. Í so máta sigst S.E.V. at vera bundið við sáttmála.

Uppskotsstillararnir meta tað óheppið, at løgtingið ikki er kunnugt við henda sáttmála — eisini út frá tí, at uppskotsstillararnir ikki eru í iva um, at løgtingið, áðrenn tann ætlaða vatnorkuútbyggingin er lokin, noyðist at veðhalda fyri nógvum 100 mió. kr. í láni m.a. til tess, at skuldin til donsku fyritøkuna Højgaard & Schultz kann verða goldin.

Orkuráðið kannar í løtuni eftir boðum frá landsstýrinum tað sokallaða Veðranesætlanina.

Eftir tí, ið skrivað er í bløðunum, metir stórur partur av føroyska sakkunnleikanum, at henda ætlan, sum fevnir um eina vatnorkuútbygging í sunnara parti av Eysturoy (um Veðranesleiðina) kann geva nógv meiri orku fyri nógv minni pening, umframt at henda ætlan í nógv minni mun ávirkar og skemmir náttúru- og umhvørvið enn danska ætlanin hjá Højgaard & Schultz ger.

Uppskotsstillararnir meta tað tí vera neyðugt, ikki bert at nevnda kanning verður gjørd, men eisini, at kanningarúrslitið kemur til nágreiniliga viðgerð á løgtingi, so at ein endalig niðurstøða kann gerast á haldgóðum grundarlagi, hvat kunnleika til ymiskar alternativar útbyggingarmøguleikar viðvíkur.

Men tá er eisini neyðugt, at bíðað verður við at byrja, til støða er tikin til kanningarúrslitið.

S.E.V. hevur á fíggjarætlan síni fyri komandi ár sett av 25 mió. kr. til útbygging av vatnorkuni (tað taka uppskotsstillararnir sum eitt positivt tiltak).

Stórfyritøkan Højgaard & Schultz er ivalcyst í ávísan mun før fyri at gera arbeiðið fyri S.E.V. »upp á borg«.

Tað ljóðar í dagspressuni, at S.E.V., um teir vikja frá sáttmálanum við Højgaard & Schultz kunnu rokna við endurgjaldskravi frá danska byggifelagnum.

Uppskotsstillararnir meta tað tí verða neyðugt, at løgtingið samtykkir eitt uppskot, sum tryggjar okkum

1. At S.E.V. ikki gevur eftir fyri trýsti og byrjar eina vatnorkuútbygging á skeivum grundarlagi.
2. At neyðugar kanningar av alternativum orkumøguleikum verða gjørdar, og
3. At løgtingið fær kunnleika til samstarvssáttmálar millum S.E.V. og Højgaard & Schultz, so øll aspektir — eisini møgulig endurgjaldskrøv — kunnu takast við, tá endalig støða verður tikin.

Samsvarandi hesum viðmerkingum loyva uppskotsstillararnir sær í samband við aðru viðgerð av løgtingsmáli nr. 116/1983: Uppskot til samtyktar um »Veðranesprojektið« at seta fram omanfyristandandi uppskot.

2. viðgerð 8. mai. Málið varð beint aftur í umhvørvisnevndina, sum 9. mai legði fram soljóðandi

## Álit II

Við 2. viðgerð hin 8. mei varð málið beint aftur í umhvørvisnevndina. Nevndin hevur havt fund um málið og sendir tað hervið aftur til løgtingið.

Ein minniluti (Vilhelm Johannesen) setir fram soljóðandi uppskot til samtyktar:

Føroya Løgting samtykkir, at umhvørvisnevndin verður millumtinganevnd, at nevndin í samstarvi við orkuráðið kannar Veðranesprojektið og vatnorkuútbyggingarætlanina hjá SEV sum heild og kunnger løgtinginum úrslitið á ólavsøku 1984.

Ein annar minniluti (Petur Reinert) kann taka undir við báðum uppskotunum.

Framhaldandi 2. viðgerð 9. mai. Uppskotið til samtyktar fall við 8-0, og broytingaruppskotið frá Vilhelm Johannesen fall við 11-0 atkvøðum. Broytingaruppskotið frá Edmundi í Garði, Óla Breckmann og Jógvan Sundstein kom ikki til atkvøðugreiðslu, tí Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, játtaði, at einki skuldi henda við útbyggingini fyrrenn tingið hevði fingið úrslitið av Veðraneskanningini.

---

# 117. Broyting í løgtingslóg um trygdargrunn veiðimanna.

Ár 1984, týsdagin 27. mars legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður fram soljóðandi

# Uppskot

## til

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Trygdargrunn veiðumanna.**

§ 1. Í §§ 1 og 4 verða gjørdar hesar broytingar:

1) Sum § 1, 2. stk. verður sett: »Henda regla umfatar eisini fiskimenn við skipi ella báti, har skipacigari ella bátacigari er farin í likvidatión ella konkurs.«
2) Í § 4 verður »80%« broytt til: »90%«.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om fiskernes sikringsfond.**

§ 1. I §§ 1 og 4 foretages følgende ændringer:

1) Som § 1, stk. 2 sættes: »Denne bestemmelse omfatter også fiskere med skib eller båd, hvor skibeejeren eller bådejeren er trådt i likvidation eller gået konkurs.«
2) I § 4 ændres »80%« til: »90%«.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Løgtingslóg nr. 49 frá 7. juni 1979 um Trygdargrunn veiðumanna hevði til endamáls at tryggja føroyskum fiskimonnum og skipa/bátacigarum avrokning fyri fisk avreiddan til føroysk flakavirkir og var treytin at fáa pening úr grunninum, at kravið ikki er tryggjað við sjópanti, at kravið úrslitalcyst er roynt innkravt við rætsligari inkasso og at kravið ikki er avoldað.

Grunnurin hevur í einstøkum førum lagt pening út fyri eitt virki, tá hetta fór í likvidatión, men hevur búgvið goldið upphæddina aftur til grunnin.

Tað er komið fyri, at fiskimenn hava mist pening, tá skip ella bátur er farin á húsagang og manningin ikki er tryggjað við sjópanti.

Fyri at bøta um hetta hevur landsstýrið hildið tað verið neyðugt at víðka heimildina hjá grunninum til eisini at umfata slík dømir.

Harnæst heldur landsstýrið tað vera rætt at hækka útgjaldið úr 80 % til 90% av ágóðanum.

1. viðgerð 3. apríl 1984. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 27. mars 1984 og undir 1. viðgerð tann 3. apríl beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og tekur ein samd nevnd undir við at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Undir viðgerðini hevur verið vist á, at í § 2 í løgtingslóg nr. 49 frá 7. juni 1979 um Trygdargrunn Veiðumanna er orðingin viðvíkjandi treytum fyri at fáa pening úr grunninum ikki sett upp á besta hátt og at, tá treyt fyri at fáa pening er, at kravið ikki er tryggjað við sjópanti, er ikki orsøk til at seinasta linja í § 2: »at kravið ikki er avoldað« er við. Verandi uppseting er ógreið og verður tí mælt til, at treytin um at kravið ikki er avoldað verður strikað. Sostatt setir ein samd fíggjarnevnd fram soljóðandi

## Uppskot

## til

| **løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Trygdargrunn Veiðumanna.** | **lagtingslov om ændring i lagtingslov om Fiskernes Sikringsfond.** |
|---|---|
| **§ 1.** Í § 2 verður orðingin »at kravið ikki er avoldað« strikað. | **§ 1.** I § 2 udgår følgende »at kravet ikke er forældet«. |
| **§ 2.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin. | **§ 2.** Denne lov træder i kraft straks. |

2. viðgerð 7. mai. § 1. varð samtykt við 27-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. at fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 26-0 atkvøðum.

Uppskot frá nevndini til § 1 samtykt við 25-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. At fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð samtykt við 26-0 atkvøðum.

3. viðgerð 9. mai. Málið endaliga samtykt við 32-0 atkvøðum. Uppskotið frá nevndini sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 31-0 atkvøðum.

Lóg nr. 72 frá 13. juni 1984.

# 118. Broyting í býarskipannarlógini.

Ár 1984, týsdagin 3. apríl legði løgmaður vegna Tórbjørn Poulsen, landsstýrismann, fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir.**

**§ 1.** Í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2 verður 1. partur orðaður soleiðis:
»Í býarskipanarnevndini sita 5 limir, valdir soleiðis:
Formaður, sum er løgfrøðingur, og sum Føroya løgting velur,
1 sum er byggikønur, og sum Føroya Kommunufelag og Tórshavnar kommuna velja,
3 limir, sum Føroya landsstýri velur.
2. § 2, 2. partur, gongur út.
3. Í § 2, 5. parti, verður »6 ár« broytt til »4 ár«.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om byplaner og byggevedtægter.**

**§ 1.** I lagtingslov nr. 13 af 21. maj 1954 om byplaner og byggevedtægter med senere ændring foretages følgende ændringer:

1) I § 2 affattes stk. 1 således:
»Byplannævnet har 5 medlemmer, der vælges således:
En formand, der er jurist og vælges af Færøernes lagting,
1 der er byggesagkyndig og vælges af Færøernes Kommuneforening og Tórshavns kommune, og
3 medlemmer, som Færøernes landsstyre vælger.
2. § 2, stk. 2 udgår.
3. I § 2, stk. 5 ændres »6 år« til »4 år«.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Eftir galdandi reglum sita 3 limir í býarskipanarnevndini. Hin formaður, sum Føroya løgting velur, 2 limir, annar valdur av Føroya landsstýri og annar av Tórshavnar býráð. Harumframt kann landsstýrið seta tveir limir uttan atkvøðurætt, tá eru konir í býarskipanarmálum.

Eftir lógaruppskotinum verður broytingin tann, at limurin valdur av Tórshavnar býráð, nú verður valdur av Føroya Kommunufelag og Tórshavnar kommunu í felag, og at teir 3 limirnir, sum landsstýrið velur, nú allir koma at fáa atkvøðurætt í nevndini. Hesir 3 limirnir kundu hóskandi umboða ávikavist landsverkfrøðingin, Matrikulstovuna og Føroya Jarðarráð.

1. viðgerð 6. apríl 1984. Málið varð beint í lóganevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 29. mars 1984 og undi 1. viðgerð 6. apríl beint í lóganevndina.

Lóganevndin hevur á fundi tann 30 apríl viðgjørt málið og tekur undir við uppskotinum, men setir tó til uppskot landsstýrisins fram soljóðandi

**broytingaruppskot**

Í § 2 verður 1. partur orðaður soleiðis:

»Í býarskipanarnevndini sita 5 limir, valdir soleiðis:

Formaður, sum er løgfrøðingur, og sum Føroya løgting velur,

2 sum eru byggikonir, valdir ávikavist av Føroya Kommunufelag og Tórshavnar kommunum,

2 limir, sum Føroya landsstýrið velur.«

I § 2 affattes stk.1 således:

»Byplannævnet har 5 medlemmer, der vælges således:

Én formand, der er jurist og vælges af Færøernes lagting,

2 der er byggesagkyndige og vælges henholdsvis af Færøernes Kommuneforening og Tórshavns kommune,

2 medlemmer [illegible] landsstyret vælger.«

2. viðgerð 8. mai. Málið varð aftur beint í lóganevndina, sum 9. mai legði fram soljóðandi

**Álit**
**II**

Undir 3. viðgerð varð málið beint aftur í lóganevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið av nýggjum og tekur undir við málinum, men setir tó fram til landsstýrisins uppskot fylgjandi

**broytingaruppskot**

Í § 2 verður 1. partur orðaður soleiðis:

»Í býarskipanarnevndini sita 5 limir, valdir soleiðis:

Formaður, sum er løgfrøðingur, og sum Føroya løgting velur,

3 sum eru byggikønir, harav Føroya Kommunufelag velur 2 og Tórshavnar kommuna 1,

3 limir, sum Føroya landsstýri velur.«

I § 2 affates stk. 1 således:

»Byplannævnet har 5 medlemmer, der vælges således:

En formand, der er jurist og vælges af Færøernes lagting,

3 der er byggesagkyndige. hvoraf Færøernes kommuneforening vælger 2 og Tórshavns kommune 1,

3 medlemmer, som Færøernes landsstyre vælger.«

9. mai framhaldandi 2. viðgerð av málinum. Atkvøðugreiðsla á seinni fundi sama dag. § 1 samtykt við 29-0, broyting frá nevndini til I samtykt við 29-0, § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð samtykt við 30-0 atkvøðum.

3. viðgerð 9. mai. Málið endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 802-8 Lóg nr. 59 frá 5. juni 1984.

---

Løgtingstíðindi 1983 A - 73

# 119. Regulering av fiskiskapinum á NAFO-økinum í 1984.

Ár 1984, týsdagin 3. apríl legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið tekur til eftirtektar samtyktina í NAFO-ársfundinum í september 1983 um regulering av fiskiskapinum á konventiónsøkinum í 1984.

**Viðmerkingar:**
Á 5. regluliga ársfundi í NAFO, hildin í Leningrad, USSR, 19.-23. september 1983 var tilráðingin aftur í ár frá vísindaliga ráðnum, at stovnurin av toski á Flemish Cap framvegis var ov lítil, og mælt varð tí frá at fiska av honum í 1984.

Føroyar, saman við Noreg, Portugal og Spania, sum júst varð vorðin limur, kundu ikki taka undir við einum toskabanni á hesum øki.

Føroyska sendinevndin setti tí fram uppskot um at halda fram við somu skipan sum í 1983. Semja var um føroyska uppskotið, tó so at Spania tók fyrivarni og seinri hevur mótmælt og ásett egna kvotu, ið teir meta, samsvarar við teirra veiðu har undanfarin ár. Onnur lond hava ikki mótmælt. Føroyska toskakvotan á Flemish Cap, NAFO øki 3 M verður sostatt 2.900 tons eins og í 1983.

Føroyingar veiða eisini árliga nakað av toski á øki 3NO. Eingin kvota verður her serstakliga tillutað føroyingum, men vit hava seinastu árini veitt av hesi kvotu, tillutað øðrum (»others«).

Toskakvotan til »others« í 3NO var eins og í 1983 sett til 700 tons. Víst verður til hjálagda skjal 1.

SCEDULE I — Quota Table [1] for Year 1984 [5&7]

| Column I | II | III | IV | V | VI | VII | VIII | IX | X | Xi |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Contracting Party | Cod | Cod | Redfish | Redfish | American plaice | American plaice | Yellowtail | Witch | Capelin | Skuid (Illex) |
| | Div.3M | Div.3NO | Div.3M | Div.3LN | Div.3M | Div.3LNO | Div.3LNO | Div.3NO | Div.3NO | Subareas 3+4 [3+4] |
| 1. Bulgaria | - | - | 300 | - | - | - | - | - | - | 500 |
| 2. Canada | 180 | 11,650 | 700 | 12,850 | 150 | 54,200 | 16,584 | 3,000 | - | N.S. [6] |
| 3. Cuba | 480 | - | 1,550 | 2,250 | | - | - | - | - | 2,250 |
| 4. European Economic Community | 2,415 | 210 | 1,200- | - | | 700 | 340 | - | - | N.S. [6] |
| 5. Faroe Islands (Denmark) | 2,900 | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| 6. German Democratic Republic | - | - | - | 850 | - | | - | - | - | - |
| 7. Iceland | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| 8. Japan | - | - | 400 | - | - | - | - | - | - | 2,250 |
| 9. Norway | 1,200 | - | - | - | | - | - | - | - | - |
| 10. Poland | 500 | - | - | - | - | - | - | - | - | 1,000 |
| 11. Portugal | 3,500 | 1,100 | 1,900 | - | 350 | | - | - | - | 500 |
| 12. Romania | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 500 |
| 13. Spain | 560 | 9,000 | - | - | - | - | - | - | - | 2,250 |
| 14. USSR | 1,270 | 3,340 | 13,850 | 8,900 | 1,000 | - | - | 1,950 | - | 5,000 |
| 15. Others | 50 | 700 | 100 | 150 | 500 | 100 | 76 | 50 | - | - |
| 16. Special Reservation [2] | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| 17. Total Allowable Catch | 12,965 [5] | 26,000 [7] | 20,000 | 25,000 | 2,000 | 55,000 | 17,000 | 5,000 | 0 | 150 |

[1] Quotas are in metric tons.

[2] There are no Special Reservations for 1984.

[3] The opening date for the squid *(Illex)* fishery is 1 July.

[4] Any quota listed for squid may be increased by a transfer from any »coastal stat« as defined in Article 1, para. 3 of the NAPO convention, provided that the TAC for squid is not exceeded. Tranfers made to contracting Parties conducting fisheries for squid in the Regulatory Area shall be reported to the Executive Secretary, and the report shall be made as promtly as possible.

[5] The TAC will not be increased beyond 12,965 m.t. until the Scientific Council advises that the age 3 + mean biomass has reached a level approximately equal to one-half the mean age 3 + equilibrium biomass associated with fishing at F max, and assuning long term average recruitment levels.

[6] Not Specified because the allocations to these Contracting Parties are yet undetermined, although their sum shall not exceed the difference between the total of allocations to other Contracting Parties and the TAC.

TAC shall not be increased until such time the Scientific Council reports that age 3 + annual mean biomass has reached 200,000 metric tons.

1. viðgerð 6. apríl 1984. Málið varð beint í marknaðarnevndina sum legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 3. apríl 1984 og við 1. viðgerð 6 apríl 1984 beint í marknaðarnevndina, ið hevur viðgjørt málið.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 13. apríl 1984. Uppskot landsstýrisins samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1519-20.

---

# 120. Regulering av føroyska fiskiskapinum í 1984 í kanadiskum sjógvi.

Ár 1984, týsdagin 3. apríl legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

**Løgtingið** tekur til eftirtektar fiskikvotur føroyinga í kanadiskum sjógvi

í 1984 sambært rammusáttmála frá 3. juni 1980 millum Danmark og Kanada um føroysk fiskirættingi í kanadiskum sjógvi.

**Viðmerkingar:**
Í samband við 5. regluliga ársfundin í NAFO í Leningrad, USSR, 19.—23. september 1983 varð fundur hildin millum umboð fyri Føroya landsstýri og kanadisku stjórnina um føroysk fiskirættindi í 1984 í kanadiskum sjógvi sambært rammusáttmálan við Kanada.

Kvotaynski landsstýrisins fyri 1984 vóru:

| Øki | Toskur | Svartkalvi |
|---|---|---|
| 0 | — | 800 |
| 2GH | 3.000 | 300 |
| 2J3KL | 1.000 | 300 |

Í 1983 vóru kvoturnar:

| Øki | Toskur | Svartkalvi |
|---|---|---|
| 0 | | 3.000 |
| 2GH | 1.000 | |
| 2J3KL | 1.450 | |

Sambært fotoavrit av telexi frá 30. december 1983, skjal 1, hevur kanadiska stjórnin samtykt at tilluta Føroyum fylgjandi kvotur fyri 1984:

| Øki | Toskur | Svartkalvi |
|---|---|---|
| 0 | — | 3.000 |
| 2GH | 2.500 | 500 |
| 2J3KL | — | 500 |

Umframt hesar nevndu kvotur hava føroyingar í 1984 eins og undanfarin ár atgongd til at veiða hemara í kanadiskum sjógvi.

Landsstýrið hevur heitt á kanadisku myndugleikarnar um enn einaferð at umhugsa at tilluta Føroyum eina toskakvotu á økinum 2J3KL. Enn er ikki frætt, um hetta ynskið kann eftirlikast.

16,54 *Skjal 1.*

81235 tingns fa
323921 etr dk

udenrigsministeriet den 30. dec. 1983 kl. 1655

færøernes lsndsstyre
torshavn

fremme den 30. december 1983
personalc ikkc indkaldes

faeroeske kvoter i canadiske farvand 1984.
telefonsamtale holm pedersen/olafson den 30.12.83.

i henhold til aftale citeres hermed den i kopi modtagne telex-meddelelse fra den canadiske ambassade:

citb
- - - - faroes fishing plan 1984
We have advised a. olafsson, director, faroese home goverment by commercial telex that the 1984 faroes fishing authorization ia as follows:

| species | stock | area | allocations (tons) | daily catch rate (tons) | fishing days | days on ground |
|---|---|---|---|---|---|---|
| cod | 2gh | | 2.500 (*) | 7 | 357 | 411 |
| g halibut | 2j-3kl | | 500 | 3 | 167 | 192 |
| g halibut | 2gn | | 500 | 3 | 167 | 192 |
| g halibut | 0 | | 3.000 | 4 | 750 | 863 |

(*) includes usual 1,000 tons allocation plus 1,500 tons transfer from 2j plus 3kl
ditslut

oe.p.4/holm pedersen

81235 fingns fa
312921 etr dk

1. viðgerð 6. apríl 1984. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 11. apríl legði fram soljóðandi

*Álit*

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 3. apríl 1984 og við 1. viðgerð 6. apríl 1984 beint í Marknaðarnevndina, ið hevur viðgjørt málið.
Fyn samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 13. apríl 1984. Atkvøðugreiðslan 4. mai. Uppskot landsstýrisins samtykt við 31-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1500-1-11-8.

# 121. Studningur til útjaðara-fiskavirki.

Ár 1984, týsdagin 3. apríl legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um útjaðarafiskavirki.**

**§ 1.** Landsstýrinum verður heimilað at veita teimum í 2. stk. nevndu fiskavirkjum flutningsstuðning fyri frystar og saltaðar fiskavørur, seldar til útflutnings og fluttar landvegis ella sjóvegis frá útjaðaraplássi til millumlanda flutningshavn.

*2. stk.* Fiskavirki kunnu søkja landsstýrið um at koma undir skipanina í 1. stk. Loyvi verður givið til fiskavirki, sum hava størri flutningsútreiðslur pr. kg. vøru enn fiskavirki, ið liggja við nýtiliga millumlanda flutningshavn. Landsstýrið fær heimild til við kunngerð at áseta hvørjar havnir, ið koma undir hetta heitið.

*3. stk.* Studningur verður givin

**lagtingslov om fiskerivirksomheder.**

**§ 1.** Landsstyret bemyndiges til at yde de i stk. 2 nævnte fiskerivirksomheder transporttilskud for frosne og saltede fiskevarer, der er solgt til eksport og transporteret på land eller over hav fra udkantdistrikt til international transporthavn.

*Stk. 2.* Fiskerivirksomheder kan ansøge landsstyret om at komme under ordningen i stk. 1. Tilladelse gives til fiskerivirksomheder, der har større transportudgifter pr. kg. varer end fiskerivirksomheder, der er beliggende ved brugbar international transporthavn. Landsstyret får hjemmel til med bekendtgørelse at foreskrive, hvilke havne, der kan komme under denne betegnelse.

eftir flutningshátti, vøruslagi og seldari nøgd, sum víst í flutningstalvuni í 4. stk. Ávíst virki kann bert fáa játtað studning til ein flutningshátt, sjóvegis ella landvegis.

*4. stk.* Studningstalva

| *Flutningsháttur og vøruslag* | *oyru/kg* |
|---|---|
| Flutt sjóvegis | |
| Frystur laksur | 0 |
| Fryst fiskaflak, flatpakkað | 12 |
| Fryst fiskaflak, annar pakningur | 12 |
| Fryst slógv | 12 |
| Saltfiskur | 12 |
| Flutt landvegis | |
| Frystur laksur | 0 |
| Fryst fiskaflak, flatpakkað | 5 |
| Fryst fiskaflak, annar pakningur | 3 |
| Fryst slógv | 2 |
| Saltfiskur | 3 |

§ 2. Landsstýrinum verður heimilað at áseta nærri reglur fyri hvussu studningurin í § 1 skal fyrisitast, herundir eisini at áseta hvørja upplýsingarskyldu leiðsla og umboð fyri virkið hava.

§ 3. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. apríl 1984.

*Stk. 3.* Tilskudet ydes efter transportmåde, vareart og solgt kvantum, som angivet i tilskudstavle i stk. 4. Den enkelte virksomhed kan kun få bevilget støtte til en slags transportmåde, over hav eller på land.

*Stk. 4.* Tilskudstavle

| *Transportmåde og vareart* | *øre/kg* |
|---|---|
| Transporteret over hav | |
| Frossen laks | 0 |
| Frosse fiskefilét, fladpakket | 12 |
| Frossen fiskefilét, anden emballage | 12 |
| Frosset fiskeaffald | 12 |
| Saltfisk | 12 |
| Transporteret over land | |
| Frossen laks | 0 |
| Frosset fiskefilét, fladpakket | 5 |
| Frosset fiskefilét, anden emballage | 3 |
| Frosset fiskeaffald | 2 |
| Saltfisk | 3 |

§ 2. Landsstyret får bemyndigelse til at fastsætte nærmere regler for, hvordan tilskudet i henhold til § 1 skal administreres, herunder også at foreskrive, hvilke oplysningspligter virksomhedens ledelse og repræsentation har.

§ 3. Denne lov træder i kraft 1. april 1984.

**Viðmerkingar:**
Útjaðara fiskavirki hava sum kunnugt størri útflutningsútreiðslur enn fiskavirki, sum liggja á støðum við millumlandaflutningshavn, t.v.s. flutningshavn, sum kann nýtast til inn og útskiping av vøruni til og frá útlandinum.

Landsstýrið er av teirri fatan, at hesi útjaðarafiskavirki eiga at fáa eitt ávíst fíggjarligt endurgjald fyri tann meirkostnað, ið hesi virki hava av at flyta vøruna til annan stað. Virki harafturímóti, ið av og á flyta vøruna til annan stað, eiga ikki at fáa endurgjald.

Studningurin er mettur at kosta landskassanum kr, 500-600 túsund árliga.

Av praktiskum orsøkum er studningurin ásettur sum ávís upphædd pr. kg. vøru Hetta kann grundgevast við, at á- og avskipan er rættiliga stórur partur av kostnaðinum, og tí hevur fráleikin ikki so stóran týdning.

Ætlanin er, at Lønjavningargrunnurin skal fyrisita studningin. Fyrisitingararbeiðið verður mett til 1/4 mannár og fer at kosta u. kr. 30.000.

1. viðgerð 6. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 3. apríl 1984 og undir 1. viðgerð tann 6. apríl beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið, og er ein samd nevnd av teirri áskoðan, at orsøk er til at gera ávísar broytingar í orðingini íø 1, 1. og 2. stk. Heldur enn at nýta orðingina »til millumlanda flutningshavn« vil fíggjarnevndin mæla til at sett verður »til útflutningshavn«. Viðvíkjandi loyvinum, ið umrøtt verður í § 1, 2. stk., mælir fíggjarnevndin til, at orðingin »verður givið« verður broytt til »kann verða givið«. Somuleiðis mælir fíggjarnevndin til, heimildin verður veitt landsstýrinum saman við fíggjarnevndini til við kunngerð at áseta, hvørjar havnir ið koma undir hetta heiti.

Undir viðgerðini varð víst á, at beinast var, um tað uppskot til kunngerð, sum umrøtt er í § 1, stk. 2, varð viðlagt lógaruppskotinum frá landsstýrinum.

Sostatt setir ein samd figgjarnevnd fram soljóðandi

**broytingaruppskot**

§ 1 verður orðað soleiðis:
»Landsstýrinum verður heimilað at veita teimum, ið 2. stk. nevndu fiskavirkjum flutningsstudning fyri frystar og saltaðar fiskavørur, seldar til útflutnings og fluttar landvegis ella sjóvegis frá útjaðaraplássi til útflutningshavn.
*2. stk.* Fiskavirki kunnu søkja landsstýrið um at koma undir skipanina í 1. stk. Loyvi kann verða givið til fiskavirkir, sum hava størri flutningsútreiðslur pr. kg. vøru enn fiskavirkir, ið liggja við nýtiliga útflutningshavn. Landsstýrið lær saman við fíggjarnevndini heimild til við kunngerð at áseta, hvørjar havnir koma undir hetta heiti.«

§ 1 affattes således:
»Landsstyret bemyndiges til at yde de i stk. 2 nævnte fiskerivirksomheder transporttilskud for frosne og saltede fiskevarer, der er solgt til eksport og transporteret på land eller over hav fra udkantdistrikt til eksporthavn.
*Stk. 2.* Fiskerivirksomheder kan ansøge landsstyret om at komme under ordningen i stk. 1. Tilladelse kan gives til fiskerivirksomheder, der har større transportudgifter pr. kg. varer end fiskerivirksomheder, der er beliggendi ved brugbar eksporthavn. Landsstyret får hjemmel til med bekendtgørelse at foreskrive, hvilke havne der kan komme under denne betegnelse.«

2. viðgerð 7. mai. Broyting til § 1, 2. stk. samtykt við 27-0, § 1 soleiðis broytt samtykt við 27-0, § 2 samtykt við 27-0, § 3 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 26-0 atkvøðum.

8. mai legði Tjóðveldisflokkurin fram soljóðandi

**broytingaruppskot**

§ 1 verður orðað soleiðis:
»Landsstýrinum verður heimilað at veita teimum í 2. stk. nevndu fiskavirkjum flutningsstudning fyri feskar, frystar og saltaðar fiskavørur, seldar til útflutnings.«

3. viðgerð 9. mai. Uppskot landsstýrisins endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum. Broyting til § 1 frá Tjóðveldisflokkinum samtykt við 19-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1413-8. Lóg nr. 50 frá 28. mai 1984.

---

# 122. Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Ár 1984, fríggjadagin 6. apríl legði Tórbjørn Poulsen, landssdtýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.**

**§ 1.** Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt verða gjørdar hesar broytingar:

**ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.**

**§ 1.** I lagtingslov nr. 86 fra 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat foretages følgende ændringer:

1) í § 29, nr. 13 verður »veitingar eftir § 15, § 16, § 17 og § 18 og persónligar viðbøtur eftir § 9, § 13 og § 29« broytt til »veitingar eftir § 9, § 15, § 17 og § 18 og persónligar viðbøtur eftir § 13 og § 29«.

2) § 33, nr. 7 verður orðað soleiðis:
»7) hjá persóni, sum hevur lønarinntøku, herundir fiski- og útrórarpart, fólka-, avlamis-, einkju- og aðra pensjón ein løntakarafrádráttur, sum er 2.000 kr., um inntøkan er undir 10.000 kr., tó í mesta lagi ájavnt við inntøkuna. Er inntøkan 10.000 kr. ella hægri, er frádrátturin 20% av inntøkuni, tó fyri álmanakkaárið 1984 hægst 7.800 kr. Hava bæði maður og kona inntøku, eiga bæði rætt til frádráttin. Løntakarafrádrátturin verður frá og við 1. januar 1985 pristalsviðgjørdur við pristalinum pr. 1. januar 1984 sett til 100. Broytingin í løntakarafrádráttinum verður útroknað hvønn 1. januar og kunngjørd av Líkningarráð Føroya sum galdandi fyri álmannakkárið.«

3) Sum nýtt nr. 11 í § 33 verður sett:
»11) Persónar, sum koma undir regluna, í § 2, litra a og b, fáa, um teir eru undir útbúgving og hava fastan bústað

1) I § 29, nr. 13 ændres »ydelser i henhold til § 15, §16, § 17 og § 18 og personlige tillæg efter § 9, § 13 og § 29« til ydelser efter § 9, § 15, § 16, § 17 og § 18 og personlige tillæg efter § 13 og § 29«.

2) § 33, nr. 7 affattes således:
»7) hos personlig skattepligtige, som oppebærer lønindtægt ved partsfiskeri, folke-, invalide-, enke- og anden pension et lønmodtagerfradrag, som er kr. 2.000, hvis indtægten er mindre end kr. 10.000, fradraget kan dog ikke overstige indtægtsbeløbet. Er indtægten kr. 10.000 eller mere, kan fradrages 20% af indtægtsbeløbet, dog for kalenderåret 1984 højst kr. 7.800. Oppebærer både mand og hustru disse her omhandlede indtægter, er begge berettigede til fradraget. Lønmodtagerfradraget pristalsreguleres fra og med 1. januar 1985 med pristallet pr. 1. januar 1984 sat lig med 100. Ændringer i lønmodtagerfradraget udregnes hver den 1. januar og offentliggøres af Líkningarráð Føroya som gældende for kalenderåret.«

3) Som nyt nr. 11 i § 33 indsættes:
»11) Personer, der er omfattet af bestemelsen i § 2, litra a og b, får, såfremt disse er under uddannelse med fast bopæl i

uttanlands og hava tað í hyggju at nema kunnleika har, ein fastan frádrátt upp á 15.000 kr. fyri álmanakkaárið.«

udlandet i studieøjemed, et fradrag på kr. 15.000 for kalenderåret.«

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 2. Denne lagtingslov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

*Til § 29, nr. 13:*
Eftir § 9, 2. stk. í forsorgarlógini, hevur Almannastovan skyldu í ávísum førum sum fyribils hjálp at veita hjálp sum bæði fevnir um fasta upphædd til kost og klæði v.m. og um rímuligar fastar útreiðslur. Hjálpin kann tó ikki fara upp um hægsta dagpening.

Tað er ikki møguligt við kumulativu samtíðarskattaskipanini at vissa, at treingjandi viðskiftafólk hjá Almannastovuni fáa hjálparveiting, sum tey eiga, uttan so, at hjálpin verður skattafrí.

*Til § 33, nr. 7:*
Í samtíðarskattaskipanini verður í ávísum førum neyðugt, t.d. við fráflyting ella deyðsfalli at kunna gera eina endaliga álíkning áðrenn inntøkuárið, t.v.s. áðrenn álmanakkaárið er endað.

Út frá hesum og harumframt út frá ynskinum at fáa eina so rætta fyribilsskattaskráseting sum gjørligt, verður tí skotið upp, at løntakarafrádrátturin verður ásettur við byrjan av inntøknárinum í staðin fyri sum higartil við árs enda. Løntakarafrádrátturin er fyri 1983 ásettur til hægst 7.300 kr., og skotið verður sostatt upp at hækka henda frádráttin við 500 kr., sum er tann sama upphæddin, sum løntakarafrádrátturin er hækkaður við tvey tey seinastu árini.

*Til § 33, nr. 11:*
Skotið verður her upp at seta inn aftur í lógina eina reglu, sum loyvir persónum undir útbúgving uttanlands at forvinna upp til 15.000 kr. í Føroyum í feriutíð o.l., áðrenn skattur skal gjaldast av inntøkuni.

Til samanetingar skal her førast fram, at við t.d. einum skattaprosenti upp á 15 í kommununi, kann ein persónur undir útbugving í Føroyum forvinna gott 14.000 kr., áðrenn skattur skal gjaldast. Leggjast skal afturat, at við teimum broyttu reglunum í samtíðarskattalógini

um skattskyldu, kunnu persónar, sum ikki hava fastan bústað her, dvølja her í bráðfeingi upp til 180 dagar og framvegis verða undir avmarkaðari skattskyldu.

1. viðgerð 10. apríl 1984. Málið varð viðgjørt saman við nr. 123: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan, og vórðu tey bæði beind í skattanevndina, sum 13. apríl 1984 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð framlagt av landsstýrinum tann 6. í hesum og varð undir 1. viðgerð tann 10. í hesum beint í skattanevndina.

Uppskotið miðar imoti trimum broytingum í samtíðarskattaskipanini. Hesar broytingar eru:

I. Hjálparveitingarnar til treingjandi viðskiftafólk hjá Almannastovuni eftir § 9, 2. stk. í forsorgarlógini verða skattafrían.

II. Løntakarafrádrátturin verður ásettur við byrjan av inntøkuárinum fstaðin fyri við ársenda. Hægsti frádráttur, sum fyri 1983 var 7.300 kr., verður fyri álmannakkaárið 1984 hækkaður við 500 kr. til 7.800 kr.

III. Reglan, sum loyvir persónum undir útbúgving uttanlands at forvinna upp til 15.000 kr. í Føroyum í ferðatíð o.l. áðrenn skattur skal gjaldast av inntøkuni, verður sett innaftur í lógina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 11. í hesum og mælir ein samd nevnd tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 13. apríl 1984. § 1 varð samtykt við 28-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 28-0 atkvøðum.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Málið endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

F.T.-j.nr. 430-12-45. Lóg nr. 31. frá 3. mai 1984.

# 123. Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

Ár 1984,. mikudagin 6. apríl legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.**

§ 1. Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan verður gjørd henda broyting:

§ 3, 2.stk. verður orðað soleiðis:

*»2. stk.* Fyri hvønn persón sær verður persónsfrádrátturin 4.000 kr. Fyri leysar persónar yvir 67 ár og leysar persónar, sum fáa avlamis-, einkju- ella fólkapen'sjón ella fáa hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, verður persónsfrádrátturin tó 9.500 kr. Fyri giftar persónar yvir 67 ár og giftar persónar, sum fáa avlamis- ella

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.**

§ 1. I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om udskrivning af skat til landskassen foretages følgende ændring:

§ 3, stk. 2 affattes således:

»*Stk. 2.* For hver enkelt person udgør personfradraget 4.000 kr. For enlige personer over 67 år samt enlige personer, som oppebærer invalide-, enke- eller folkepension eller oppebærer hjælp i henhold til forsorgslovens § 13, er personfradraget dog 9.500 kr. For gifte personer over 67 år samt gifte personer, som oppebærer invalide- 'ler folkepension

fólkapensjón ella fáa hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, verður persónsfrádrátturin tó 6.700 kr.«

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi beinan vegin.

eller oppebærer hjælp i henhold til forsorgslovens § 13, er personfradraget dog 6.700 kr.«

§ 2. Denne lagtingslov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Eftir § 13 í forsorgarlógini skal varandi hjálp roknast soleiðis út, at viðkomandi hevur somu upphædd til taks sum ein fólkapensjónistur við ongum øðrum inntøkum.

Um løntakarafrádrátt og persónsfrádrátt eru serligar reglur í skattalóggávuni fyri fólkapensjónistar. Um eitt fólk sostatt frá Almannastovuni fær útgoldið somu upphædd sum ein fólkapensjónistur, fær viðkomandi tá ikki somu upphædd útgoldna aftaná, at skattur er frároknaður.

Fyri at javnstilla hesar bólkar, verður skotið upp at tey, sum fáa varandi hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, skatliga verða javnstillað við fólkapensjónistar.

1. viðgerð 10. apríl 1984. Málið varð beint í skattanevndina, sum 13. apríl legði fram soljóðandi

## Álit

Uppskotið varð framlagt av landsstýrinum tann 6. í hesum og varð undir 1. viðgerð beint í skattanevndina.

Eftir lógini skal persónur, sum fær varandi hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, hava somu upphædd til taks, sum ein fólkapensionistur við ongum øðrum inntøkum.

Fyri fólkapensionistar eru serligar reglur í skattalógávuni um løntakara- og persónsfrádrátt, men hesar reglur eru ikki galdandi fyri áðurnevnda bólkin, sum fær varandi hjálp.

Ætlanin við lógaruppskotinum er, at hesir báðir bólkar verða javnstillaðir, hvat skatti viðvíkur.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 11. í hesum og mælir ein samd nevnd tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 13. apríl 1984. § 1 varð samtykt við 28-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 28-0 atkvøðum.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Málið endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 430-12-45. Lóg nr. 39 frá 3. mai 1984.

---

# 124. Løgtingsmál um brennistudning til ávísar pensjónistar v.fl.

Ár 1984, fríggjadagin 6. apríl legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um brennistudning til ávísar pensjónistar v.fl.**

**§ 1.** Í fíggjarárinum 1984/85 verður úr landskassanum veittur ein brennistudningur til pensjónistar við kr. 1.200 til hvønn pensjónist.

**§ 2.** Brennistudningurin verður latin til fólk, ið áðrenn 1. oktober 1984 hava fingið játtað fólkapensjón, avlamispensjón ella einkjupensión ella hava sent inn umsókn um slíka pensión, tí rætturin til hana er uppnáddur, og seinri fáa pensiónina játtaða.

**§ 3.** Treytin fyri at fáa brennistudning er, at pensjónisturin við oktober útgjaldingina 1984 hevur rætt til pensjónsviðbót. Hjúna-

**lagtingslov om brændselstilskud til visse pensionister m.fl.**

**§ 1.** I finansåret 1984/85 ydes af landskassen et brændselstilskud til pensionister på kr. 1.200 til hver pensionist.

**§ 2.** Brændselstilskud ydes til personer, som inden den 1. oktober 1984 har fået bevilget folkepension, invalidepension eller enkepension eller har indsendt ansøgning om sådan pension, fordi retten til denne er opnået, og senere får pensionen bevilget.

**§ 3.** Betingelsen for at opnå brændselstilskud er, at pensionisten ved oktober udbetalingen 1984 er berettiget til pensions

felagar, sum bæði eru pensjónistar, eiga ein part í felag.

§ 4. Í fíggjarárinum 1984/85 verður úr landskassanum eisini veittur ein brennistudningur við kr. 1.200,- til fólk, sum tann 1. oktober 1984 fáa hjálp sambært § 13 í forsorgarlógini, undir somu treytum sum fyrisett í § 3 í hesi lóg.

§ 5. Brennistudningurin verður útgoldin av Føroya Gjaldstovu.
*2. stk.* Annars hevur Almannastovan fyrisitingina av brennistudninginum um hendi.
*3. stk.* Avgerðir, sum Almannastovan hevur tikið, kunnu innan 4 vikur skjótast inn fyri landsstýrið.

§ 6. Brennistudningur er ikki skattskyldugur.

§ 7. Henda lóg fær gildi frá 1. apríl 1984.

tillæg. Ægtepar, som begge er pensionister, får tilsammen en andel.

§ 4. I finansåret 1984/85 ydes af landskassen også et brændselstilskud til personer, der den 1. oktober 1984 modtager hjælp efter forsorgslovens § 13, på samme betingelser som fastsat i § 3 i denne lov.

§ 5. Brændselstilskuddet udbetales af Føroya Gjaldstova.
*Stk. 2.* Iøvrigt varetager Almannastovan administrationen af brændselstilskuddet.
*Stk. 3.* Afgørelser, som Almannastovan har truffet, kan indenfor 4 uger indbringes for landsstyret.

§ 6. Brændselstilskuddet er ikke skattepligtigt.

§ 7. Denne lov får virkning fra 1. april 1984.

**Viðmerkingar:**
Í fíggjarárinum 1980/81 varð brennistudningur veittur til ávísar pensjónistar við kr. 900,- til hvønn pensiónist sambært løgtingslóg nr. 51 frá 12. mai 1980 um brennistudning til ávísar pensjónistar.

Í fíggjarárinum 1981/82 var brennistudningur veittur til ávísar pensjónistar við 1.200,- kr. til hvønn pensjónist sambært løgtingslóg nr. 26 frá 5. mai 1981 um brennistudning til ávísar pensjónistar.

Í fíggjarárinum 1981/82 varð sambært løgtingslóg nr. 76 frá 11. december 1981 um brennistudning til stakar uppihaldarar brennistudning eisini veittur støkum uppihaldarum við egnum húsarhaldi, sum fingu hjálp sambært § 22 í forsorgarlógini.

Í fíggjarárinum 1982/83 og 1983/84 varð sambært løgtingslógunum nr. 79 frá 21. mai 1982 og nr. 52 frá 20. mai 1983 um brennistudning til ávísar pensjónistar og stakar uppihaldarar brennistudningur veittur við 1.200 kr. til hvønn í hvørjum fíggjarári.

Útreiðslurnar til brennistudningsskipanina vóru í fíggjarárinum

| | |
|---|---|
| 1980/81 | 2.606.000 kr. |
| 1981/82 | 3.596.000 - |
| 1982/83 | 3.671.000 - |

Á fíggjarløgtingslógini 1983/84 eru játtaðar 3.700.000 kr. og hevur nýtslan til nú verið 3.649.200 kr. Á uppskotinum til fíggjarløgtingslóg 1984/85 eru avsettar 3.700.000 kr. til brennistudning.

Landsstýrið metir, at tørvur er á, at sami brennistudningur, sum er veittur ávísum pensjónistum og ávísum støkum uppihaldarum í fíggjarárinum 1983/84, verður veittur í fíggjarárinum 1984/85.

Í mun til løgtingslógina fyri 1983/84 er gjørd broyting í § 4 vegna ta broyting í forsorgarlógini, sum varð gjørd við »Lov om ændring af lov for Færøerne om offentlig forsorg« nr. 246 frá 8. juni 1983. Nakrir stakir uppihaldarar fáa nú hjálp eftir § 9, 1. og 2. stk., í forsorgarlógini, har útreiðsla til brenni er roknað upp í hjálpina. Hinvegin eru fólk við varandi hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini í somu fíggjarligu støðu sum pensjónistar.

Tí verur skotið upp, at fólk við hjálp eftir § 13, sum kunnu vera stakir uppihaldarar, koma í staðin fyri stakar uppihaldarar við egnum húsarhaldi. Hetta fer helst ikki at ávirka útreiðsluna.

1. viðgerð 10. apríl. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av landsstýrinum og varð við 1. viðgerð hin 10. apríl 1984 beint í sosialu nevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja tað.

8. mai løgdu tingmenninir Vilhelm Johannesen, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Bech, Jona Henriksen, Jóannes Dalsgaard, Jørgen Thomsen og Atli P. Dam fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

Í § 1, 1. stk. verður »kr. 1.200« broytt til »kr. 1.500«.

2. viðgerð 8. mai. § 1 varð samtykt við 32-0, §§ 2-6 samtyktar við 32-0, § 7 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt 32-0 atkvøðurm.

3. viðgerð 9. mai. Málið endaliga samtykt við 32-0 atkvøðum. Broyting frá Javnaðarflokkinum fall við 15-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1010-20-1. Lóg nr. 63 frá 5. juni 1984.

---

# 126. Studningur til Nes, Sunda, Eiðis, Hósvíkar, Vestmanna, Tórshavnar, Miðvágs/Sandavágs, Sands og Vágs kommunur til byggibúning o.a.t. av grundøkjum á landøkjum havnanna.

Ár 1984, týsdagin 8. mai legði vega- og havnanevndin fram soljóðandi

**Álit**

Umsóknir frá fleiri kommunum um byggibúning o.a.t. av fdnaðarøkjum í sambandi við havnir, eru beindar í figgjarnevndina til viðgerðar.

Í Nes kommunu snýr tað seg um planering og byggibúning undir eini kuldagoymslu hjá P/f Nyki.

Umsóknin frá Sunda kommunu snýr seg um cykajáttan til gerð og byggibúning av økinum undir nýggja skeljavirkinum á Oyri.

Á Eiði snýr tað seg um planering og byggibúning av øki vestan fyri verandi virkisbygning hjá P/f Norðís.

Í Hósvík er ynski at fáa fylt út í sjógvin fyri øki til bygningar o.a. í samband við fiskaaling í fyrstu syftu.

Í Vestmanna snýr umsóknin seg um regulering og asfaltering av økinum rundan um virkisbygningin hjá P/f Tórplast og bygninginum hjá Vestmanna Timburhandli.

Í Tórshavn snýr tað seg um at realisera eina skipan fyri havnarøkið vestan fyri Álakersvík; arbeiðini í hesum sambandi verða umlegging av vegum og útgrevstur, uppfylling, regulering og planering av byggiøkjum.

Í Miðvági er sambært umsóknini ætlanin at gera fullfíggjaða vegaskipan á havnarøkinum undir Húsabakka; vit halda at ov tíðliga er at byggja allar teir ætlaðu vegirnar, tí enn veit eingin hvørji ynskini verða um bygging har; men sambandið frá bryggjuni móti Sandavági má etablerast, og játtanin er ætlað til hetta endamál.

Á Sandi eru tað neyðug arbeiði í sambandi við øking um virkishúsini hjá P/f Borgini.

Í Vági snýr umsóknin seg um regulering og byggibúning av ídnaðarøki á Tjørn. Játtanin er ætlað til gerð av ídnaðarøki innan fyri bryggjuna í Oyrunum.

**Uppskot til løgtingslóg um**

studning til Nes, Sunda, Eiðis, Hósvíkar, Vestmanna, Tórshavnar, Miðvágs/Sandavágs, Sands og Vágs kommunur til ávís arbeiði í sambandi við bygging ella útbygging av ídnaðar-

tilskud til Nes, Sunda, Eiðis, Hósvíkar, Vestmanna, Tórshavnar, Miðvágs/Sandavágs, Sands og Vágs kommuner til visse arbejder i forbindelse med etablering eller udbygning af in-

virki á havnarøki í avvarðandi kommunu.

§ 1. Úr landskassanum verður veittur studningur til niðanfyrinevndu kommunur til at fylla út ella spreingja burtur fyri grundøki til avvarðandi havn og byggibúna tað, til at regulera og festa øki uttan um ídnaðarbyggingar, soleiðis at viðurskiftini lúka tey krøv, ið galda fyri avvarðandi virki og til onnur tiltøk í sambandi við nútímansgerð av ídnaðarvirki.

Studningurin er 65% av byggipeninginum, tó í mesta lagi 65% av niðanfyri tilskilaðu upphæddum, og verður hann goldin við eins stórum ársgjøldum í so nógv fylgjandi fíggjarár, sum niðanfyri er tilskilað, frá og við fíggjarárinum 1984/85 at rokna:

| Kommuna áramál | | kr. |
|---|---|---|
| Nes | 2 | 600.000,00 |
| Sunda | 2 | 600.000,00 |
| Eiðis | 2 | 600.000,00 |
| Hósvíkar | 2 | 600.000,00 |
| Vestmanna | 2 | 600.000,00 |
| Tórshavnar | 5 | 2.500.000,00 |
| Miðvágs/ Sandavágs | 2 | 600.000,00 |
| Sands | 2 | 600.000,00 |
| Vágs | 2 | 600.000,00 |
| | | 7.300.000,00 |

dustrivirksomhed på havneareal i vedkommende kommune.

§ 1. Af landskassen ydes tilskud til nedennævnte kommuner til fyldning eller udsprængning for grundareal ved vedkommende havn og til byggemodning af dette, til regulering og befæstelse af arealer uden om industribygninger, så forholdene opfylder de for vedkommende virksomhed gældende krav, samt til andre foranstaltninger i forbindelse med modernisering af en industrivirksomhed.

Tilskudet andrager 65% af anlægsudgifterne, dog højst 65% af nedenfor anførte beløb og udbetales med lige store årsrater i det nedenfor angivne antal på hinanden følgende finansår fra og med finansåret 1984/85 at regne:

| Kommune åremål | | kr. |
|---|---|---|
| Nes | 2 | 600.000,00 |
| Sunda | 2 | 600.000,00 |
| Eiðis | 2 | 600.000,00 |
| Hósvíkar | 2 | 600.000,00 |
| Vestmanna | 2 | 600.000,00 |
| Tórshavnar | 5 | 2.500.000,00 |
| Miðvágs/ Sandavágs | 2 | 600.000,00 |
| Sands | 2 | 600.000,00 |
| Vágs | 2 | 600.000,00 |
| | | 7.300.000,00 |

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð 8. mai. § 1 varð samtykt við 32-0, §§ 2-6 samtyktar við 32-0, § 7 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 32-0 atkvøðum.

3. viðgerð 9. mai. Málið endaliga samtykt við 32-0 atkvøðum. Broyting frá Javnaðarflokkinum fall við 15-0 atkvøðum.

Lóg nr. 63 frá 5. juni 1984.

---

# 127. Løgtingslóg um landsjørð.

Ár 1984, fríggjadagin 6. apríl legði Páll Vang, landsstýrismaður fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um landsjørð.**

§ 1. Endamálið við hesi lóg er, at tað fyrisitingarliga gerast møguleikar fyri at menna framleiðsluna av landsjørðini. Lógin miðar ímóti at fáa landsjørðina

**lagtingslov om landsjord.**

§ 1. Formålet med denne lov er at skabe mulighed for administrativt at stimulere landjordens produktion. Loven tilsigter en sammenlægning af lands-

í hóskandi brúkseindir, ið kunnu geva eina rímiliga úrtøku.

**1. bólkur**
**Jarðarráð og álitismenn.**

**§ 2.** Jarðarráðið hevur tey størv um hendur, sum verða áløgd tí sambært lóg ella eftir avgerð landsstýrisins.
*2. stk.* Landsstýrið kann fyriskipa reglugerð fyri Jarðarráðið.

**§ 3.** Í Jarðarráðnum eru 5 limir, sum verða valdir soleiðis:
1 av Føroya Búnaðarfelag,
1 av Bóndafelag Føroya og
3 av Føroya Landsstýri.
*2. stk.* Starvstíðin er 4 ár.
*3. stk.* Fyri hvønn lim verður tiltaksmaður valdur eftir reglunum í 1. stk.
*4. stk.* Landsstýrið velur formann ráðsins.

**§ 4.** Limir ráðsins eru inhabilir til at luttaka í málsviðgerðum eftir somu reglum sum sorinskrivarin.
*2. stk.* Avgerðir ráðsins skulu vera skrivligar grundaðar.
*3. stk.* Eingin avgerð kann samtykkjast í Jarðarráðnum, eru ikki 3 atkvøður fyri henni.

**§ 5.** Jarðarráðið er heimilað at

jorden i passende brugsenheder, der vil være i stand at afgive et rimeligt udbytte.

**1. afsnit**
**Landbrugsråd og tillidsmænd.**

**§ 2.** Landbrugsrådet forvalter de sagsområder, som pålægges det ved lov eller landsstyrebeslutning.
*Stk. 2.* Landsstyret kan foreskrive reglement for landbrugsrådet.

**§ 3.** Landbrugsrådet har 5 medlemmer, der vælges således:
1 af Føroya Búnaðarfelag,
1 af Bóndafelag Føroya og
3 af Føroya Landsstýri.
*Stk. 2.* Funktionsperioden er 4 år.
*Stk. 3.* For hvert medlem vælges der suppleant efter reglerne i 1. stk.
*Stk. 4.* Landsstyret vælger rådsformanden.

**§ 4.** Rådsmedlemmerne er inhabile for så vidt angår deltagelse i sagsbehandling efter de samme regler, som er gældende for sorenskriveren.
*Stk. 2.* Rådets afgørelser skal være skriftligt begrundet.
*Stk. 3.* Ingen afgørelse kan vedtages i landbrugsrådet, uden at den opnår 3 stemmer.

**§ 5.** Landbrugsrådet har hjem-

seta so nógvar álitismenn um landið, sum tørvur er á.

*2. stk.* Álitismenninir ganga Jarðarráðnum til handa við metingum og tílíkum, og í málum, ið krevja serkunnleika til viðurskiftini á plássinum. Avgerðarrætt hava teir ongan.

*3. stk.* Eftir somu reglum kann ráðið taka sær serkøna hjálp.

mel til at antage det antal tillidsmænd over hele landet, som der er behov for.

*Stk. 2.* Tillidsmændene skal assistere landbrugsrådet med vurderinger o.lign., og i sager, der kræver særlig kundskab til forholdene på stedet. De har ingen beslutningsmyndighed.

*Stk. 3.* Efter samme regler kan rådet antage hjælp med specialkundskab.

**§ 6.** Samsýning til limir og starvsfólk Jarðarráðsins ásetir landsstýri, og verður hon goldin úr Jarðargrunninum. Jarðargrunnurin rindar útreiðslur til skrivstovuhald ráðsins eftir fyriskipan landsstýrisins.

**§ 6.** Vederlag til landbrugsrådets medlemmer og personale fastsættes af landsstyret og afholdes af jordfonden. Jordfonden afholder udgifterne til rådets kontorhold efter landsstyrets bestemmelse.

## 2. bólkur
## Jørð hjá tí almenna.

**§ 7.** Eftir niðanfyri nevndu reglum fyrisitir Jarðarráðið alla almenna jørð, ið ikki verður fyrisitin av øðrum almennum stovni, herundir kommunum.

*2. stk.* Landsstýrið kann fyriseta gjøllari reglur fyri hesari fyrisiting.

*3. stk.* Har sum annað ikki er ásett, kunnu avgerðir Jarðarráðsins leggjast fyri landsstýrið, tó ikki um festiskifti og leigu av traðum. Slík kærumál skulu vera framkomin til landsstýrið í seinasta lagi vikudagin 6 vikur

## 2. afsnit
## Offentlig Jord.

**§ 7.** Efter nedenfor nævnte regler forvalter landbrugsrådet al offentlig jord, der ikke forvaltes af anden offentlig institution, herunder kommuner.

*Stk. 2.* Landsstyret kan fastsætte nærmere regler for denne forvaltning.

*Stk. 3.* Hvor andet ikke er fastsat, kan landbrugsrådets beslutninger forelægges landsstyret, dog ikke når det drejer sig om fæsteskifte og leje af trøer. Sådanne klager skal være indkommet til landsstyret senest uge-

aftan á, at avgerð ráðsins er kunngjørd viðkomandi, ella er send honum á posthúsið, og seinni komin fram til móttakaran.
*4. stk.* Jarðarráðið skal í avgerðum skila til, hvønn myndugleika kærast kann til.

§ 8. Tann jørð, sum nevnd er í § 9, kann
1) verða nýtt til almenn endamál,
2) verða latin í festi (sambært § 9, 1. stk.)
3) verða leigað eitt ásett áramál (sambært § 16) og
4) latast til ognar (sambært 5. bólk).

dagen 6 uger efter at rådets afgørelse er gjort vedkommende bekendt, eller sendt ham i posten og senere kommet komdtageren i hænde.
*Stk. 4.* Landbrugsrådet skal i dets afgørelser angive, til hvilke myndigheder der kan ankes.

§ 8. Den jord, der er nævnt i § 9, kan
1) anvendes til offentlige formål,
2) bortfæstes (i henhold til § 9, stk. 1),
3) udlejes et bestemt åremål (i henhold til § 16) og
4) afhændes til ejendom (i henhold til 5. afsnit).

**3. bólkur**
**Jørð í festi.**

§ 9. Jarðarráðið hevur rætt til at lata almenna jørð í festi.
*2. stk.* Festið stendur við, so leingi festarin er á lívi, tó bert til hann hevur fylt 70 ár.
*3. stk.* Jørð kann latast í festi eitt avmarkað styttri áramál.
*4. stk.* Festitreytirnar verða ásettar í einum festibrævi og skulu fremja endamálið við hesi lóg. Festibrøvini, sum altíð gjølla skulu skila til, hvat festinum tilhoyrir, verða prentað á oyðubløð, sum landsstýrið skal góðkenna.

**3. afsnit**
**Bortfæstning af jord.**

§ 9. Landbrugsrådet er berettiget til at bortfæste offentlig jord.
*Stk. 2.* Fæsteforholdet vedvarer, så længe fæsteren lever, dog kun til han er fyldt 70 år.
*Stk. 3.* Jord kan bortfæstes for et begrænset kortere tidsrum.
*Stk. 4.* Fæstevilkårene fastsættes i et fæstebrev og skal fremme formålet med denne lov. Fæstebrevene, der altid nøje skal angive, hvad der hører til fæstet, bliver trykt i form af blanketter, der skal godkendes af landsstyret.

§ 10. Festarin rindar øll gjøld,

§ 10. Fæsteren afholder alle af-

sum hvíla á festinum, og rindar jarðargrunninum festileigu.
*2. stk.* Løgtingið skipar í serstakari lóg fyri, hvussu leigan verður ásett.

**§ 11.** Verður festið leyst, skal Jarðarráðið taka avgerð um, hvørt tað kann verða uppihildið sum sjálvstøðugt festi ella verða lagt saman við øðrum festi.
*2 stk.* Skal festið halda fram sum sjálvstøðugt brúk, hava hjúnaðarfelagi og lívsarvingar seinasta festara, um teir hava eitt minstamark av jarðarbrúkskunnleika, sum landsstýrið ásetir í kunngerð, framíhjárætt til at taka við festinum í hesi raðfylgju:
1. Eftirsitandi hjúnafelagi,
2. elsta barn ella eftirkomari tess,
3. yngri barn ella eftirkomari tess.

*3. stk.* Hava fleiri framíhjárætt til festið, tekur Jarðarráðið avgerð um, hvør skal hava fyrsta framíhjárætt.
*4. stk.* Situr tann, sum hevur framíhjárætt sambært hesi grein longu við landsjørð, missir hann framíhjárættin soleiðis at skilja, at Jarðarráðið kann treyta nýtsluna av framíhjárættinum av, at hann sigur frá sær brúkið, hann hevur frammanundan.
*5. stk.* Umsøkjari, sum er ónøgdur við avgerð tikna við heimild í § 9, 1. stk. kann krevja málið lagt fyri landbúnaðarstevnu við

gifter, der påhviler fæstet, og indbetaler fæstelejen til jordfonden.
*Stk. 2.* Lagtinget fastsætter i særlig lov, hvordan lejen fastsættes.

§ 11. Bliver fæstet ledigt, skal landbrugsrådet træffe bestemmelse om, hvorvidt det kan opretholdes som særskilt fæste eller sammenlægges med et andet fæste.
*Stk. 2.* Skal fæstet fortsætte som selvstændigt brug, har den sidste fæsters ægtefælle og livsarvinger, hvis de besidder et minstemål af landbrugskyndighed, der fastsættes af landsstyret i kundgørelse, forhåndsret til fæstet i denne rækkefølge:
1) Efterlevende ægtefælle,
2) ældste barn eller dets efterkommer,
3) yngre barn eller dets efterkommer.

*Stk. 3.* Har flere forhåndsret til fæste, tager landbrugsrådet bestemmelse om, hvem der skal have første forhåndsret.
*Stk. 4.* Besidder den, der har forhåndsret i henhold til denne paragraf, allerede landsjord, fortaber vedkommende forhåndsretten således at forstå, at landbrugsrådet kan betinge afbenyttelsen af forhåndsretten af, at vedkommende frasiger sig det brug, han besidder i forvejen.
*Stk. 5.* En ansøger, der er util-

kærurætti til yvirlandbúnaðarstevnu.

freds med en beslutning taget med hjemmel i § 9, stk. 1, kan kræve sagen forelagt en landbokommission med kæreret til overlandbokommissionen.

**§ 12.** Sundurbýti av festijørð til fleiri brúk kann bert fara fram sum undantak, tá festi verður leyst, og bert eftir avgerð Jarðarráðsins. Tað gerst ikki, uttan so at ráðið ætlar um, at tey nýggju festini kunnu røkjast sum sjálvstøðugir festigarðar ella so, at tað frábýtta verður lagt aftrat einum festigarði, ið frammanundan er ov lítil at verða røktur sum sjálvstøðugur garður.
*2. stk.* Verður sundurbýti framt við festiskifti, hevur tann, ið hevur framíhjárætt sambært § 10, rætt til at velja, hvat av teimum nýggju festunum, hann tekur.

**§ 12.** Opdeling af fæstejord i flere brug kan kun forekomme undtagelsesvis, når et fæste bliver ledigt, og kun efter landbrugsrådets bestemmelse. Det kan ikke ydes uden at rådet antager, at de nye fæster kan drives som selvstændige fæstegårde eller således, at den fradelte jord tillægges en fæstegård, der i forvejen er for lille til at blive drevet som selvstændig gård.
*Stk. 2.* Finder opdeling sted ved fæsteskifte, har den, der har forhåndsret i henhold til § 10, ret til at udvælge sig hvilket af de nye fæster, han måtte ønske.

**§ 13.** Tann, ið hevur landsjørð í festi, skal hava bústað sín, har festið er. Jarðarráðið kann í serstøkum førum við góðkenning landsstýrisins loyva undantaki frá hesum. Festið skal røkjast sum eitt væl umsitið jarðarbrúk. Eftir skráseting av hvørjum festi verður framleiðsluskyldan hjá hvørjum festi sær ásett. Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur um framleiðsluskylduna og tey tiltøk, ið neyðug eru, fyri at bóndur kunnu lúka sína skyldu.

**§ 13.** Den, der har landsjord i fæste, skal have fast bopæl, hvor fæstet er beliggende. Landbrugsrådet kan i særlige tilfælde efter landsstyrets godkendelse tillade undtagelse herfra. Fæstet skal drives som et vellholdt landbrug. Ved registrering af hvert fæste bliver hvert fæstes produktionspligt fastsat for sig. Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse de nærmere bestemmelser om produktionspligten og de foranstaltninger, der er nødvendige, for at bønder kan opfylde deres forpligtelse.

*2. stk.* Jarðarráðið hevur eftirlit við, um framleiðsluskyldan verður hildin.

*3. stk.* Noktar festarin eftirlitinum upplýsingar sambært § 13, 2. stk. kann Jarðarráðið uppsiga festimálið.

*4. stk.* Verða treytirnar viðvíkjandi bústaði, framleiðsluskyldu, festileigu og innstøðu ikki hildnar, ella kriatúr ella bygningar verða misrøkt, ella festarin ikki heldur sínar lániskyldur til jarðargrunnin skal Jarðarráðið taka støðu festarans til viðgerðar og áleggja honum at fáa viðurskiftini í rættlag. Verður áheitanin ikki fylgd, hevur Jarðarráðið rætt til at siga festimálið upp, hóast ásetanina í § 9, 2. stk. og 3. stk.

*5. stk.* Avgerðir Jarðarráðsins um uppsøgn sambært 3. stk. og 4. stk. kunnu skjótast inn fyri rættin.

*6. stk.* Festarin hevur rætt til at nýta festið við lunnindum, ið hoyra tí til á ein slíkan hátt, sum samsvarar 1. stk. Hann hevur veiðirættindi av festinum, rætt til at fiska í áum og vøtnum. Hann hevur torvskurðar- og kolanámsrætt til egna nýtslu. Meðan hann situr við festinum, hevur hann rætt til at leiga øðrum veiðurættindi, herundir fuglabjørg og urðar, og fiskirættindi, tó í mesta lagi fyri 5 ár í senn. Hann hevur eisini rætt til at selja grót, eyr, sand og

*Stk. 2.* Landbrugsrådet fører tilsyn med, hvorvidt produktionspligten bliver overholdt.

*Stk. 3.* hvis fæsteren nægter at give tilsynet oplysninger i henhold til § 13, stk. 2, kan landbrugsrådet opsige fæstemålet.

*Stk. 4.* Bliver betingelserne vedrørende bopæl, produktionspligt, fæsteleje og besætning ikke overholdt, eller kreaturer eller bygninger forsømmes, eller fæsteren ikke overholder sine låneforpligtelser overfor jordfonden, skal landbrugsrådet tage fæsterens forhold til behandling og pålægge ham at få forholdet bragt i orden. Bliver henstillingen ikke fulgt, er landbrugsrådet bemyndiget til at opsige fæstemålet uanset bestemmelsen i § 9, stk. 2 og stk. 3.

*Stk. 5.* Landbrugsrådets beslutninger vedrørende opsigelse i henhold til stk. 3 og stk. 4 kan appelleres til domstolene.

*Stk. 6.* Fæsteren er berettiget til at gøre brug af fæstet med tilhørende rettigheder, således at det er i overensstemmelse med stk. 1. Han besidder fæstede jagtrettigheder og har fiskerettighederne til elve og indsøer. Han sidder inde med retten til tørveskær og kulbrydning til eget forbrug. Medens han besidder fæstet, har han ret til at udleje jagtrettighederne til anden side, herunder fuglefjelde og urer, og fiskerettigheder, dog højst for 5

tara o.t. við loyvi Jarðarráðsins. Ráðið ásetir eisini sølutreytirnar.

år ad gangen. Han har også ret til at sælge sten, grus, sand, tang o. lign. med landbrugsrådets tilladelse. Rådet fastsætter også salgsbestemmelserne.

**§ 14.** Fráfarandi festari hevur rætt til endurgjald eftir nærri reglum, sum landsstýrið ásetir við kunngerð, frá nýggja festaranum, eftir meting fyri egnar íløgur, sum gjørdar eru á festinum, og sum jarðarráðið hevur góðkent frammanundan, at farið varð undir.
*2. stk.* Við festiskifti letur Jarðarráðið brúkið kanna og meta, og tekur støðu til, um grundarlag er fyri endurgjaldskravi móti seinasta festara.

**§ 14.** En afgående fæster er berettiget til erstatning efter nærmere regler, som landsstyret fastsætter ved kundgørelse, fra den nye fæster, efter vurdering for egne investeringer, der er tilført fæstet, og som landbrugsrådet har godkendt, inden de blev foretaget.
*Stk. 2.* Ved fæsteskifte foretager landbrugsrådet en undersøgelse og vurdering af bruget, og tager stilling til, hvorvidt der foreligger grundlag for erstatningskrav mod den sidste fæster.

**§ 15.** Festari, sum ikki rættstundis svarar Jarðargrunninum tey gjøld, sum henda lóg áleggur, kann pantast.

**§ 15.** En fæster, der ikke rettidigt udreder de afgifter til jordfonden, som fastsættes ved denne lov, kan udpantes.

## 4. bólkur
## Leiga av landsjørð.

## 4. afsnit
## Leje af landsjord

**§ 16.** Jarðarráðið hevur rætt til at leiga út traðir og traðarstykki, stykki til urtagarðsbrúk, grundstykki til húsabygging, íðnaðarendamál og tílíkt í eitt ávíst áramál.
*2. stk.* Áðrenn jørð verður útleigað burtur av einum festigarði ella leigutrøð, eigur festarin ella

**§ 16.** Landbrugsrådet er berettiget til at udleje trøer og trøstykker, lodder til havebrug, byggegrunde til husbyggeri, industriformål o. lign. for et bestemt åremål.
*Stk. 2.* Inden jord bliver fralejet en fæstegård eller lejetrø, skal fæsteren eller trøbesidderen ad-

tráðarmaður at verða eftirspurdur; sýtir hann fyri at ganga við til leigumálið, kann hann krevja málið lagt fyri landbúnaðarstevnu við kærurætti til yvirlandbúnaðarstevnu.

*3. stk.* Verður jørð útleigað sambært 1. stk., skal ráðið fyrst ætla um, hvørt leigan av lendinum skaðar festið. Ráðið skal ansa eftir, at jørð ikki verður innløgd av haganum, so leingi innløgd jørð er, ið ikki verður nýtt, sum hon eigur at vera.

*4. stk.* Tá ið lendi verður leigað út sambært stk. 1, ásetir Jarðarráðið treytir, sum fremja endamálið við hesi lóg. Skrivligur leigusáttmáli verður gjørdur, har treytirnar fyri leigu eru tilskilaðar.

*5. stk.* Leigusáttmáli sambært stk. 1 fellur burtur ella kann sigast upp, tá ið

1. leigarin doyr, og eftirsitandi hjúnarfelagi ikki er,
2. felag stendur sum leigari, og felagið verður avtikið ella verður óvirkið,
3. leigarin ikki fylgir teimum treytum, sum ásettar eru í sáttmálanum ella lóggávuni annars.

**§ 17.** Hvørja ferð eitt leigumál er at enda komið, letur Jarðarráðið leigumálið kanna og meta, og tekur støðu til um grundarlag er fyri endurgjaldskravi móti seinasta leigara.

spørges. Nægter han at gå med til lejemålet, kan han kræve sagen forelagt en landbokommission med kæreret til overlandbokommissionen.

*Stk. 3.* Bliver jord udlejet i henhold til stk. 1, skal rådet først vurdere, om udlejningen af arealet vil forvolde fæstet skade. Rådet skal påse, at jord ikke bliver optaget af udmarken, så længe der findes optaget jord, der ikke bliver anvendt, som den skal.

*Stk. 4.* Når et areal bliver udlejet i henhold til stk. 1, fastsætter landbrugsrådet betingelserne således, at de fremmer formålet med denne lov. Skriftlig lejekontrakt bliver oprettet, hvor lejevilkårene anføres.

*Stk. 5.* En lejekontrakt i henhold til stk. 1 bortfalder eller kan opsiges, når

1. lejeren dør, og der ikke er nogen efterlevende ægtefælle,
2. et selskab står som lejer, og selskabet opløses eller bliver uvirksomt,
3. lejeren ikke overholder de i kontrakten og lovgivningen iøvrigt fastsatte betingelser.

**§ 17.** Hver gang et lejemål er udløbet, foretager landbrugsrådet en undersøgelse og vurdering af lejemålet, og tager stilling til, hvorvidt der foreligger grundlag for erstatningskrav mod den sidste lejer.

§ 18. Leigari, sum ikki rættstundis svarar jarðargrunninum tey gjøld, sum henda lóg áleggur, kann pantast.

§ 18. En lejer, der ikke rettidigt udreder de afgifter til jordfonden, som denne lov fastsætter, kan udpantes.

## 5. bólkur
## Søla av landsjørð og keyp av ognarjørð.

§ 19. Jarðarráðið hevur rætt til at selja burtur av almennari jørð til almenn endamál, grundstykki til húsabygging, ídnaðarendamál o.t.

*2. stk.* Verða øki seld til slík endamál, sum nevnd eru í 1. stk., skal ráðið ansa eftir at selja ódyrkaða jørð fram um dyrkaða, og jørð, sum er óvanda dyrkilendi fram um gott lendi. Somuleiðis skal ráðið ansa eftir, at ikki verða seld øki, ið liggja soleiðis fyri, at sølan skaðar ella minkar um virðið á grannajarðarbrúki meira enn neyðugt er.

*3. stk.* Fyri jørð, sum seld verður sambært hesi grein, verður at gjalda í hondina. Bert í undantaksføri kann ráðið bjoða borg, og tá bert móti 1. veðrætti í tí selda ella móti aðrari fullgóðari trygd.

*4. stk.* § 16, 2. stk. er eisini galdandi sølum viðvíkjandi.

*5. stk.* Saman við keypsprísinum verður møgulig avloysing fyri vetrarbit goldin.

## 5. afsnit
## Salg af landsjord og køb af odelsjord.

§ 19. Landbrugsrådet er berettiget til at frasælge offentlig jord til offentlige formål, byggegrunde til husbyggeri, industriformål o. lign.

*Stk. 2.* Bliver arealer solgt til sådanne formål, som nævnt i stk. 1, skal rådet påse at sælge udyrket jord frem for dyrket, og jord, som er dårligt egnet for opdyrkning frem for opdyrkelig jord. Ligeledes skal rådet påse, at der ikke bliver solgt arealer, der har en sådan beliggenhed, at salget vil skade eller formindske nabolandbrugets værdi mere end nødvendigt.

*Stk. 3.* Jord, der bliver solgt i henhold til denne paragraf, skal betales kontant. Kun i undtagelsestilfælde kan rådet tilbyde kredit, og da kun mod 1. prioritet i det solgte eller mod anden fuldgod sikkerhed.

*Stk. 4.* § 16, stk. 2 gælder også for salg.

*Stk. 5.* Sammen med købssummen bliver eventuel afløsning for vintergræsning betalt.

§ 20. Selur Jarðarráðið til byggigrundir ella tílíkt burtur av dyrkaðari jørð, sum persónur hevur leigað, kann viðkomandi fáa endurgjald fyri uppdyrking.
*2. stk.* Semjast partarnir ikki, verður nevnd sett við einum limi valdum av Føroya Jarðarráð, einum limi valdum av eigaranum og einum av sorinskrivaranum útnevndum limi.

§ 20. Frasælger landbrugsrådet arealer til byggegrunde o. lign. af opdyrket jord, som er person har i leje, kan vedkommende få erstatning for opdyrkning.
*Stk. 2.* Opnås der ikke enighed mellem parterne, bliver der nedsat et udvalg bestående af et medlem valgt af Færøernes Landbrugsråd, et medlem valgt af ejeren og et medlem udnævnt af sorenskriveren.

§ 21. Liggur ognarjørð, sum ikki verður røkt av eigaranum, og er innangarðsjørðin gott dyrkilendi, hevur Jarðarráðið rætt til, tá tað ætlar um, at tørvur er á dyrkilendi har í bygdini, at taka upp tingingar við avvarðandi eigara um at fáa jørðina til keyps.
*2. stk.* Fæst slíkt keyp í lag, og verður tað góðtikið av landsstýrinum, skal Jarðarráðið útleiga ella festa jørðina sambært ásetanunum í hesi lóg.

§ 21. Forefindes odelsjord, der ikke bliver røgtet af ejeren, og er hjemmemarken letopdyrkelig jord, er landbrugsrådet berettiget til, når det mener, at der er mangel på opdyrkelig jord i den pågældende bygd, at optage forhandlinger med vedkommende ejer om at få jorden til købs.
*Stk. 2.* Kommer sådant køb i stand, og det bliver godkendt af landsstyret, skal landbrugsrådet udleje eller bortfæste jorden i henhold til bestemmelserne i denne lov.

## 6. bólkur
## Nær lógin kemur í gildi.

§ 22. Henda lóg kemur í gildi tá tað í kunngerð verður ásett av landsstýrinum.
*2. stk.* Samstundis fara úr gildi § 1 til og við § 7 og § 10 til og við § 27 í »Lov for Færøerne nr. 174 fra 24. maj 1937 om jordbrugets fremme.«

## 6. afsnit
## Lovens ikrafttræden

§ 22. Denne lov træder i kraft når det fastsættes af landsstyret med kundgørelse.
*Stk. 2.* Samtidig ophæves § 1 til og med § 7 og § 10 til og med § 27 i »Lov for Færøerne nr. 174 af 24. maj 1937 om jordbrugets fremme« ud af kraft.

**Viðmerkingar:**
Við at áleggja framleiðsluskyldu og gera tað møguligt at fáa annan festara í staðin, um hon ikki verður hildin, skuldu møguleikarnir hjá fyrisitingini at fáa festarar við yrkisligum fortreytum og hegni at røkja jarðarbrúk verið munandi betri enn eftir galdandi lóg.

Tað, at leigumál til tráðir eisini er treytað av, at tær verða nýttar til ávís endamál, sum er ásett í leigusáttmálanum, ger eisini møguleikarnar betri at fáa betri skil á tær nógvu óroktu leigutráðirnar.

Við hóskandi brúksstødd er her, í flestum førum, hugsað um brúk, ið við góðari røkt kunnu geva einum húski rímiliga ársinntøku.

Hetta hevur við sær munandi samanlegging av smærri festum.

Á smáplássum, serliga í útoyggjum, verður mett, at tað ikki eigur at verða samanlagt í eins stóran mun, soleiðis at hon stuðlar burturflytingina, men eigur á annan hátt at verða stuðlað við vinnu, sum kann verða ískoyti til jarðarbrúkið.

Støða er ikki tikin til, hvat ið hóskandi brúk er, og ei heldur til, hvat ið er ein rímilig inntøka.

Hetta eigur at verða gjørt í samráð við vinnuna (yrkisfeløgini).

Annars eru hesar viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

*Til § 2:* Greinin kemur í staðin fyri § 11 í galdandi lóg.

*Til § 3:* Greinin kemur í staðin fyri § 5 í galdandi lóg.

Eftir § 5 í galdandi lóg sita 2 limir valdir av Føroya Landsstýri og ein av Føroya Búnaðarfelag. Talið er eftir uppskotinum økt til 5, og hevur Bóndafelag Føroya fingið rætt til at velja 1 lim. Mett verður, at eingin grund er til at lógfesta landbúnaðarráðgevaranum nakran atgongurætt til fundir Føroya Jarðarráðs.

*Til § 4:* Greinin kemur í staðin fyri § 7 í galdandi lóg, og ger onga veruliga broyting í rættarstøðuni. Grundgevingin sambært stk. 2 skal vera nágreinilig. Tað er t.d. ikki nóg mikið at upplýsa, at avgerðin er grundað á upplýsingar, sum komnar eru fram undir málinum, ella at vísa til lógarheimild.

*Til § 5:* Greinin er samsvarandi § 5, stk. 5 í galdandi lóg.

*Til § 6:* Greinin er samsvarandi § 8 í galdandi lóg.

*Til § 7:* Greinin kemur í staðin fyri § 10 í galdandi lóg.

Stk. 4 er nýtt, og er í samljóði við nýggjari fyrisitingarligum grundreglum.

*Til § 8:* Greinin kemur í staðin fyri § 12 í galdandi lóg.

*Til § 9:* Greinin kemur í staðin fyri § 15 í galdandi lóg.

*Til § 9, 2. stk.:* Mett verður rímiligt, at aldurmarkið verður tað sama sum fyri fólk í almennum starvi.

Tá tað verður hildið rímiligt at gera undantak, kann tað gerast sum áramálsfesti sambært 3. stk.

*Til § 9, 3. stk.:* Áramálsfesti eigur bert at fara fram tá ið:

1) møguleikar eru fyri samanlegging, sundurbýti ella umlegging av festum innan fyri nøkur fá ár,
2) roknast kann við, at jørðin um stutta tíð skal nýtast til annað alment endamál,
3) tá útbúgvin festari (m.a. barn) væntast at verða tøkur um stutta tíð.

*Til § 10:* Greinin kemur í staðin fyri § 17 í galdandi lóg.

*Til § 10, 2. stk.:* Miðað eigur at verða ímóti, við áseting av leigugjaldinum, at tað ikki tyngir raksturin, um so er, at framleiðsluskylda, ið nevnd er í 13. grein, 1. stk., verður hildin.

*Til § 11:* Greinin kemur í staðin fyri § 19 í galdandi lóg.

*Til § 11, 1. stk.:* Fyri at hava møguleika fyri at fáa landsjørðina í hóskandi brúkseindir er neyðugt at avmarka galdandi festirættindi hjá lívsarvingum, soleiðis at samanlegging av festum kann fara fram hvørja ferð festir verða leys, uttan mun til um lívsarvingar eru til ella ikki.

*Til § 11, 2. stk.:* Høvuðstreytin fyri at fáa festi er, at komandi festari lýkur yrkisligar fortreytir. Lýkur eftirsitandi hjúnarfelagi ella lívsarvingur hesar treytir, verður mett rímiligt, at hann hevur forrætt fram um onnur, ið eisini lúka treytirnar.

Mett verður, at tað er rættari at landsstýrið ásetir hesar treytir í kunngerð, enn at tær verða ásettar av sjálvari fyrisitingini/Jarðarráðnum.

Av tí at festini sambært hesum uppskoti eru persónlig verður tað mett neyðugt, at hjúnafelagi hevur fyrsta rætt at taka við festinum, um hann/hon lýkur yrkisligu fortreytirnar, um so er, at festarin fellur frá.

Frammíhjárætturin til festið, er í tann mun hesin er ásettur í nýggja lógaruppskotinum, broyttur í mun til fyrr galdandi lóggávu, soleiðis at tað elsta barnið, uttan mun til, um tað er drongur ella genta, ella um tað er føtt uttanfyri ella innanfyri hjúnalag hevur rættin. Sambært altjóða sáttmála, sum Danmark arbeiðir fyri at góðkenna, er ikki loyvt at gera mun á kvinnum og monnum, og sostatt ber ikki til, uttan at koma í stríð við fólkarætt, at gera arvafylgjuna soleiðis, sum áhugafelagsskapirnir hava ynskt tað, har maður gongur fram um kvinnu.

*Til § 11, 3. stk.:* Her verður serliga sipað til, tá festi skulu leggjast

saman, og tað tá til bæði (øll) festini eru lívsarvingar, ið lúka tær yrkisligu fortreytirnar.
*Til § 12:* Greinin kemur í staðin fyri § 20 í galdandi lóg.
*Til § 12, 1. stk.:* Mett verður, at tað ikki kemur ofta fyri, at garðar eru nóg stórir til beinleiðis at verða sundurbýttir, men at tað oftari verður tørvur á regulering, bæði tá talan er um at fáa eitt festi í hóskandi stødd, og tá einum festi tørvar t.d. dyrkilendi.
*Til § 13:* Greini broytir partvíst § 16 í galdandi lóg.
*Til § 13, 1. stk.:* Undantaksmøguleikin ætlast nýttur, har grannabygdir liggja soleiðis, at eingi er til hindurs fyri at røkja festið, um so er, at festi og bústaður eru hvørt í síni bygd.
*Til § 13, 3. og 4. stk.:* Tá festari ikki lýkur ásettar treytir fyri at hava fingið festið ella misrøkir tað, skal fyrisitingin (Jarðarráðið) hava betri møguleikar at gera nakað við viðurskiftini — møguliga taka festið aftur — enn tað hevur eftir galdandi lóg, sum krevur, at sakarmál verður reist frá Jarðarráðsins síðu.
*Til 5. stk.:* Mál av uppsøgn av festara verða hildin at vera so álvarslig, at møguleiki eigur at vera fyri, at dómstólarnir taka støðu til málið.
*Til § 13, 6. stk.:* Søla av m.a. gróti, eyri og sandi er at skilja sum leyst tilfar. Verður talan um meira umfatandi sølur, sum t.d. grót frá broti ella grevstur eftir sandi, er tað Jarðarráðið, sum stendur fyri søluni, móti at innkomni peningurin verður settur á avvarðandi festikonto við vanligum treytum.
*Til § 14:* Greinin er nýggj. Tiltøk, sum eru góðkend av Jarðarráðnum, verða virðismett, tá tey eru liðug.

Tað virðið, sum er omanfyri fígging fyri jarðarbrúkslán og studning, verður roknað sum eginíløga.
*Til 1. stk.:* Skyldan at lata fráfarandi festara hald fellur burtur.

Við festiskifti verða virðini gjørd upp.

Endurgjaldskrav verður at seta um:
a) innistøðan ikki er til
b) bygningar eru verri farnir enn av vanligum brúki og
c) bøur og/ella hagi eru í verri standi, enn tá tikið varð við festinum.

*Til § 16, 1. stk.:* Sambært uppskotinum verður bert møguligt at *leiga* búnaðarjørð (traðir).

Leigumálini av jørð skulu vera upp á áramál og persónlig ella til fyritøkur (sambært § 16, 5. stk. nr. 1 og § 16, 5. stk. nr. 2).
*Til § 16, 4. stk.:* Leigumál av traðum verður bert gjørt, um leigarin

kann vsa á framleiðsluætlanir, sum Jarðarráðið kann góðkenna. Heldur nýtslan av trøðni, sambært teimum góðkendu ætlanunum, av eini hvørjari orsøk uppat, er leigumálið burturfallið, sjálvt um áramálið sambært sáttmálanum ikki er úti (sambært § 16, 5. stk. nr. 3).

*Til § 19:* Sambært uppskotinum verður eingin møguleiki at keypa jørð til jarðarbrúk (traðir).

*Til § 19, 3. stk.:* Søla upp á borg kann koma fyri, tá kommunur keypa størri lendi til byggigrundir. Lánini skulu ganga í mesta lagi í 5 ár, ella til lendið er tikið í brúk sambært endamálinum við keypinum.

*Til § 19, 5. stk.:* Gjaldið fyri vetrarbit verður til eina og hvørja tíð ásett av Føroya Jarðarráð.

*Til § 20:* Endurgjald eigur bert at verða latið, tá selt verður av dyrkaðum lendi, sum er í nýtslu sum dyrkað lendi.

*Til § 21:* Endamálið við at keypa ognarjørð er, at hon kann leggjast saman við festi og soleiðis gera brúkið meira hóskandi til støddar.

*Til § 22:* Login verður sett í gildi við kunngerð frá landsstýrinum. Lógin verður sett í gildi, tá tær í lógini nevndu kunngerðir og skrásetingar eru gjørdar.

1. viðgerð 10. apríl. Málið varð beint í landbúnaðarnevndina, sum 8. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av Føroya Landsstýri tann 6. apríl 1984 og við 1. viðgerð 10. apríl beint í landbúnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meirluta og ein minniluta.

Nevndin ásannar, at málið er so umfatandi, at ikki verður tíð til í hesi tingsetuni at viðgera tað nóg gjølla, hernndir m.a. at fáa ummæli frá teimum feløgum og stovnum, sum lógaruppskotið viðvíkur.

Ein meiriluti (Eilif Samuelsen, Hilmar Kass, Atli P. Dam og Hans M. Joensen) mælir tó landsstýrinum til at leggja lógaruppskot fram aftur í næstu tingsetu.

Ein minniluti (Øssur Dam Jacobsen) mæir til, at landbúnaðarnevndin verður millumtinganevnd til viðgerðar av hesum máli.

2. viðgerð 8. mai. Uppskot meirilutans í landbúnaðarnevndini varð samtykt við 21-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1700-9.

---

# 128. Uppskot til løgtingslóg um stuðul til musikkskúlar.

Ár 1984, týsdagin 11. apríl legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um stuðul til musikkskúlar.**

§ 1. Eftir reglunum í hesi lóg verður latin studningur úr landskassanum til musikkskúlar, ið hava til endamáls í samarbeiði við heim, skúla og aðrar musikkfelagsskapir at menna musikalsku evni og gávur næmingana og leggja grundarlag undir einum ríkum musikklívi á staðnum.

§ 2. Til tess at røkka endamálinum skal musikkskúlin geva

**lagtingslov om tilskud til musikskoler.**

§ 1. Efter reglerne i denne lov ydes der af landskassen tilskud til musikskoler, som har til formål i samarbejde med hjem, skole og andre musikinstitutioner at udvikle elevernes musikalske evner og gaver og lægge grundlaget for et rigt lokalt musikliv.

§ 2. For at opfylde dette formål skal musikskolen give grund-

grundútbúgving, vokal- og ella instrumentalundirvísing, undirvísing í samanspæli og samansangi, kunning um mentunararvin og um nýgjar og gamlar framburðarhættir innan musikkin og skipa fyri næmingaframførslum.

*2. stk.* Undirvísingin kann enda við roynd.

*3. stk.* Landsskúlaráðið ásetir nærri reglur hesi undirvísing viðvíkjandi.

uddannelse, vokal- og /eller instrumentalundervisning, undervisning i sammenspil og sammensang, orientering om kulturarven og nye og gamle fremførelsesmåder inden for musikken og arrangere elevkonserter.

*Stk. 2.* Undervisningen kan ende med en prøve.

*Stk. 3.* Undervsningsrådet fastsætter nærmere regler om denne undervisning.

§ 3. Áðrenn studningur verður latin, skal skúlin, sum skal vera knýttur at eini kommunu ella einum kommunalum felagsskapi, vera góðkendur av Landsskúlaráðnum.

*2. stk.* Fyri at fáa studning skal skúlin harumframt lúka hesar treytir:

1) undirvísingin skal standa øllum í boði,
2) undirvísingin skal vera skipað eftir reglum sambært § 2, 3. stk.,
3) næmingagrundarlagið skal í minstalagi vera 30,
4) skúlin skal hava minst ein fastan lærara,
5) næmingar skulu gjalda eitt árligt gjald, sum er góðkent av Landsskúlafyrisitingini.

*3. stk.* Landsstýrið kann eftir tilmæli frá Landsskúlaráðnum og teirri í § 7 umrøddu nevnd gera frávik frá reglunum í 1. stk. og 2. stk. 3. pkt.

§ 3. Forinden tilskud ydes, skal skolen, som skal være knyttet til en kommune eller et kommunalt fællesskab, godkendes af Undervisningsrådet.

*Stk. 2.* For at få tilskud skal skolen herudover opfylde følgende betingelser:

1) undervisningen skal stå åben for alle,
2) undervisningen skal være tilrettelagt efter regler, der er fastsat i medfør af § 2, stk. 3.,
3) elevgrundlaget skal mindst være 30,
4) skolen skal have mindst en fast lærer,
5) eleverne skal betale en årlig afgift, som undervisningsdirektoratet godkender.

*Stk. 3.* Landsstyret kan efter indstilling fra Undervisningsrådet og det i § 7 omtalte udvalg gøre undtagelse fra reglen i stk. 1 og stk. 2 pkt. 3.

§ 4. Studningur til musikkskúlar verður latin soleiðis:
1) 50% av útreiðslunum til læraraløn ir,
2) ferðaútreiðslur til lærarar, sum undirvísa á fleiri musikkskúlum.

§ 5. Lærarar við musikkskúlarnar skulu hava musikkpedagogiskt prógv frá musikkkonservatorium ella aðra hægri musikkútbúgving.
*2. stk.* Lærararnir verða settir av Landsskúlaráðnum eftir tilmæli frá avvarðandi kommunu ella kommunufelagsskapi.
*3 stk.* Læraraløn ir skulu góðkennast av landsstýrinum.

§ 6. Til tess at samskipa alla musikkundirvísing í Føroyum setir landsstýrið eftir tilmæli frá Landsskúlaráðnum ein leiðara við ábyrgd yvir fyri landsstýrinum. Leiðarin skal hava musikkpedagogiskar kvalifikatiónir, smb. § 5, 1. stk.
*2. stk.* Landsskúlaráðið ásetir nærri reglur fyri virki musikkskúlaleiðarans.

§ 7. At vera musikkskúlaleiðaranum til hjálpar at samskipa musikkundirvísingina setir landsskúlastjórin eina nevnd við umboðum fyri musikkskúlarnar og Landsskúlafyrisitingina.

§ 4. Tilskud til musikskoler ydes således:
1) 50% af udgifterne til lærerløn,
2) befordringsudgifter til lærere, som underviser på flere musikskoler.

§ 5. Lærere ved musikskolerne skal have musikpedagogisk eksamen fra et musikkonservatorium eller anden højere musikuddannelse.
*Stk. 2.* Undervisningsrådet ansætter lærerne efter indstilling fra vedkommende kommune eller kommunale fællesskab.
*Stk. 3.* Lærerlønnen skal godkendes af landsstyret.

§ 6. Med den opgave at samordne al musikundervisning på Færøerne ansætter landsstyret efter indstilling fra undervisningsrådet en leder, der er ansvarlig over for landsstyret. Lederen skal have musikpædagogiske kvalifikationer, jfr. § 5, stk. 1.
*Stk. 2.* Undervisningsrådet sætter de nærmere regler for musikskolelederens virksomhed.

§ 7. Til hjælp for musikskolelederen i arbejdet med at samordne musikundervisningen nedsætter undervisningsdirektøren et udvalg med repræsentanter for musikskolerne og undervisningsdirektoratet.

*2. stk.* Landsskúlaráðið ger nærri reglur fyri virki nevndarinnar.

*Stk. 2.* Undervisningsrådet udfærdiger nærmere regler for udvalgets virksomhed.

**§ 8.** Hvør musikkskúli ger á hvørjum ári áðrenn 1. september uppskot til fíggjarætlan fyri skúlan fyri komandi fíggjarár og sendir tað til musikkskúlaleiðaran.
*2. stk.* Musikkskúlaleiðarin leggur uppskotini til fíggjarætlan fyri nevndina, sum er umrødd í § 7, og sendir síðani Landsskúlafyrisitingini uppskotini við tilmæli frá nevndini áðrenn 15. september.

**§ 8.** Hver musikskole udarbejder hvert år inden 1. september forslag til budget for skolen for det kommende finansår og sender dette til musikskolelederen.
*Stk. 2.* Musikskolelederen forelægger forslagene til budget for det udvalg, der er nævnt i § 7, og sender derefter forslagene til Undervisningsdirektoratet med indstilling fra udvalget inden 15. september.

**§ 9.** Henda lóg fær gildi beinan vegin.

**§ 9.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Á vári 1981 vóru stig tikin til at skipa fyri musikkundirvísing við professionellum lærarakreftum. Landsstýrið ásannar, at um vónir skulu vera fyri at fáa eitt ríkt musikklív her á landi, so er neyðugt, at skaptir verða betri møguleikar fyri at fáa musikkundirvísing enn teir, ið higartil hava verið.

Landsstýrið hevur stuðlað hesum royndarmusikkskúlanum við at veita fíggjarligan stuðul av kontoini: Tónleikur og sangur, og hevur Landsskúlafyrisitingin skipað fyri tí fyrisitingarliga.

Royndarmusikkskúlin hevur síðani hildið fram skúlaárini 1982/83 og 1983/84.

Omanfyri standandi løgtingslógaruppskot er úrslit av tí arbeiði, sum nevnd, sett av Landsskúlastjóranum 17. november 1982 at gera uppskot til lóg um musikkundirvísing, hevur gjørt, sí álit hjálagt sum skjal 1.

Tveir limir í nevndini tóku ikki undir við uppskotinum, og hevur ein teirra gjørt sítt egna uppskot, sum er hjálagt sum skjal 2.

Uppskotið hjá nevndini hevur umframt [illegible]

verið viðgjørt í Landsskúlafyrisitingini og Landsskúlaráðnum, og eru ávísar broytingar gjørdar í upprunauppskotinum.

Løgtingslógaruppskotið miðar ímóti at skapa møguleikar fyri, at kommunur, annað hvørt einsamallar ella í samarbeiði við eini ella fleiri grannakommunur, kunnu seta á stovn musikkskúlar, harvið skuldi verið møguligt at fingið eina skipan, sum tryggjaði, at øllum stóð í boði at fáa undirvísing í musikki.

Um sjálva skipanina verður víst til bls. 21 og 22 í álitinum og viðmerkingarnar til tær einstøku greinirnar í lógini, sí álitið bls. 5 ff. Um kostnaðin verður víst til álitið bls. 9.

*Sí skjølini 14 A-B.*

1. viðgerð 13. apríl. Málið varð beint í skúlanevndina, sum 8. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 11. apríl 1984 og undir 1. viðgerð 13. apríl 1984 beint í skúlanevndina.

Skúlanevndin hevur á fundi 4., 7. og 8. mai 1984 viðgjørt málið, og tekur nevndin undir við uppskotinum og mælir til at samtykkja lógaruppskot landsstýrisins við fylgjandi ískoyti, og setir fram soljóðandi

## broytingaruppskot

| | |
|---|---|
| Í § 5, 2. stk. verður skoytt uppí: »ella nevndini fyri musikkskúlan.« | I § 5, stk. 2 tilføjes: »eller musikskolens bestyrelse«. |

Minnilutin (Jóannes Dalsgaard og Finnbogi Isaksen) mælir til fylgjandi broytingar í lógaruppskotinum:

| | |
|---|---|
| 1) Í §§ 1, 2 og 4 verður í staðin fyri »musikkskúlar«: »tónleikaundirvísing«. | 1) ændret |
| 2) Í § 3, 2. stk. 3) verður sett »20« í staðin fyri »30«. | 2) I § 3, stk. 2, 3) ændres »30« til »20«. |
| 3) I § 3, 2. stk. gongur pkt. 4 út, og sum nýtt pkt. 4 verður sett: | 3) I § 3, stk. 2 udgår pkt. 4, og som nyt pkt. 4 indsættes: |

»4) undirvísingin er ókeypis fyri næmingarnar.«

4) Pkt. 5 gongur út, og í staðin verður sett:

»5) Settur verður á stovn instrumentgrunnur.«

5) § 8 í uppskotinum gongur út og í staðin verður sett:

»§ 8. Musikskúlastjórin ger á hvørjum ári í samstarvi við lærararnar uppskot til fíggjarætlan og leggur uppskotið fyri nevndina, sum er umrødd í § 7, og sendir síðani Landsskúlafyrisitingini uppskotini við tilmæli frá nevndini áðrenn 15. september.«

»4) undervisningen er vederlagsfri for eleverne.«

4) Pkt. 5 udgår, og i stedet indsættes:

»5) Der etableres et instrumentfond.«

5) § 8 i forslaget udgår og i stedet indsættes:

»§ *8.* Musikskoledirektøren udarbejder hvert år i samarbejde med lærerne et forslag til budget og forelægger forslaget for udvalget, der er nævnt i § 7, og sender derefter forslagene til Undervisningsdirektoratet med indstilling fra udvalget inden 15. september.«

2. viðgerð 9. mai. § 1, í uppskoti landsstýrisins varð samtykt við 18-0, § 2 samtykt við 18-0, §§ 3-8 vórðu samtyktar við 18-9, § 9 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 17-0 atkvøðum. Broyting til § 3 frá meirilutanum fall við 15-0. Broyting frá minnilutanum til punktini 1, 2 og 3 fullu við 13-0, pkt. 4 fall við 14-0, pkt. 5 fall við 13-0, broyting frá meirilutanum fall við 16-0 atkvøðum.

9. mai løgdu tinglimirnir Ingrid Sondum, Jóannes Dalsgaard, Edmund í Garði, Asbjørn Joensen og Vilhelm Johannesen fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

1. Í § 5, 2. stk. verður skoytt uppí: »ella nevndini fyri musikkskúlan.«
og
2. Í § 3, 2. stk. 3) verður sett »20« í staðin fyri »30«.

Løgtingsmenninir Edmund í Garði, Asbjørn Joensen og Ivan Johannesen løgdu fram

**Broytingaruppskot**

Í staðin fyri »30« verður sett »25« í § 3, 2. stk. 3).

3. viðgerð 9. mai. Broytingaruppskotini 1 og 2 samtykt við 25-0. Málið sum samtykt við 2. viðgerð og broytt endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum. Broytingaruppskotið til § 3, 2. stk., 3) fall við 15-0.

F.L.j.nr. 2324-8-1. Lóg nr. 69 frá 7. juni 1984.

# 129. Lóg um minstuløn til útróðrarmenn (116/82).

10. apríl 1984 legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

## Álit

Málið er lagt fram av Javnaðarflokkinum 25. mars 1982 og við 1. viðgerð 26. apríl 1982 beint í fiskivinnunevndina.

Fiskivinnunevndin hevur viðgjørt málið og hevur 16. mai 1982 lagt fram álit í málinum. Tingið samtykti, at fiskivinnunevndin skuldi arbeiða víðari við málinum og leggja fram álit í komandi tingsetu.

Síðan tá hevur fiskivinnunevndin viðgjørt málið saman við Karl Andreasen, formanni fyri Fiskivinnuráðið, Hildibjarti Johansen, stjóra í Lønjavningargrunninum, og umboð frá Meginfelag Útróðrarmanna, og hava m.a. kannað viðurskiftini í grannalondunum.

**Danmark**

Í »Aftale om arbejdsvilkår m.v. indgået mellem Specialarbejderforbundet i Danmark og Dansk Fiskeriforening og Danmarks Havfiskeriforening«, er manningunum yvir 17 ár við einari samlaðari siglingartíð sum fiskimaður minst 4 mánaðir tryggjað eina minstuløn fyri hvønn fiskidag. Frá 1. mars 1983 er gjaldið kr. 400,00 um dagin.

**Noreg**

Norðmenn hava eitt »Minstelott[illegible]um tryggjar fiskimonnum minstuløn undir fiskiskapi. Minstalønin [illegible]skipað í 3 trygdartíðarskeið 2. januar - 30. apríl, 1. mai [illegible] og 1. september - 23. december.

Tilskotið verður útroknað eftir [illegible] reglum. Grundarlagið fyri útrokning av minstulønum [illegible] fyri skipið/bátin, og tann tíðin hvør fiskimaður [illegible]. Í 1983 var minstalønin

nkr. 1.100 um vikuna. Í garantiperioduni er ásett hægstamark fyri minstuløn, sum í 1983 var nkr. 13.200, tá maður hevur verið við í einum heilum tíðarskeiði (17 vikur).

Annars er fyriskrivað:

— at fiskiskapurin verður drivin væl og rationelt, so langt tær náttúrligu umstøðurnar gera tað møguligt,
— at fiskifarið er skrásett,
— at veiðan má vera umsett gjøgnum lóligt sølufelag,
— at fiskimaðurin má vera fyltur 15 ár í tíðarskeiðinum,
— at veiðutíðin má hava verið samanhangandi í minst 22 dagar.

**Ísland**

Sambært sáttmálan millum Sjómannasambands Íslands og Landssambands Ísl. Útvegsmanna skal útgerðarmaðurin tryggja manningini minstuløn fyri hvønn mánað (30 dagar) í mynstringartíðini, sum í dag er umleið 6.000 kr. um mánaðin í okkara peningi. Yvirmenninir fáa nakað meira.

Manningin hevur rætt at fá minstulønina útgoldna hvørja viku.

Teir smærru bátarnir mynstra fyri einar 2-3 mánaðir um ferðina.

Nevndin ásannar, at heimaútróður tey seinastu árini hevur verið minkandi, og er hetta stórt spell, tí hann hevur stóran týdning fyri samfelagið, bæði vinnuliga, sosialt og hevur umstøður til at fáa til landa ta allarbestu góðskuna.

Høvuðsorsøkin er helst tann, at henda vinna ikki hevur kunnað kappast við aðra vinnu í úrtøku, serligu vansarnir hava millum annað verið:

1. At heimaútróður hevur havt verri umstøður at fiska uttan fyri 12 fjórðingamarkið,
2. at heimaútróður hevur ikki verið undir minstulønarskipan,
3. og at heimaútróður hevur verið fyri vanbýti í ráfiskagrunninum.

Hetta uppskotið gongur út uppá at veita útróðrarmonnum eina minstuløn vetrarhálvárið. Hesum tekur nevndin undir við, við ávísum broytingum.

Í § 1, 3. stk. er manningartalið fyri at koma undir reglurnar í hesi lóg ásett til ikki at fara niður um 3 og ikki upp um 6 mans. Av hesum kann 1 vera á landi í samband við egning. Talið upp til 6 mans verður hildið at vera ov lágt og verður tí skotið upp at seta upp til 11 mans í staðin, íroknað teir á landi í sambandi við egning.

Grundin er tann, at garnabátar og snellubátar v.m. ofta hava fleiri enn 8 mans við. Tað skal í hesum sambøndi viðmerkjast, [illegible]

eingin sáttmáli er fyri snellu- og línuveiðu við Føroyar, við manning minni enn 12 monnum.

Tað verður hildið, at um tað skal vera treyt fyri at fáa minstuløn, at maður hevur verið við alt mynstringartíðarskeiðið, so fer hetta at halda menn aftur í at mynstra. Heldur eigur at verða skipað so fyri, at um báturin lýkur treytirnar, t.v.s. at hann hevur verið 18 útróðrardagar í 3 mánaðir (okt./dec.-jan./mars), so skulu allir menninir fáa minstuløn í mun til ta tíðina, teir hava verið umborð og eru mynstraðir.

Talið av útróðrarmonnum verður ikki mett at vera 1500, men heldur 700 mans, sum hava útróður sum vinnu. T.v.s. teir, sum kunnu koma upp á tal til at lúka treytirnar fyri 18 útróðrardøgum.

Eykaútreiðslan fyri lønjavningargrunnin verður mett til at vera umleið 4-5 mió. kr.

Tað finnast tíverri ikki hagtøl, sum beinleiðis kunnu undirbyggja hesa meting, men tað verður hildið at vera rættiliga vánaligt, um útróiðararmaður ikki í vetrarhálvárinum, í normalum viðurskiftum, kundi vunnið 50.000 kr. Sostatt skuldi eykaútreiðslan hjá lønjavningargrunninum til minstu lønarskipan útróðararmanna verið 10.000 kr. pr. mann, og við 700 monnum gevur hetta 7 mió. kr.

Í sama mun, sum mynstrað verður eftir hesi skipan, fellur minstiforvinningurin burtur. Tað, sum tey seinastu árini hevur verið goldið í minstaforvinningi, hevur varierað frá 1 - mió. kr. um árið.

Teir smærru bátarnir fara helst framyvir at halda seg til minstaforvinningin. Teir fáa sum nú er dupult so nógv við minstaforvinningi fyri sama tal av útróðrardøgum, tá ið fiskað verður við línu og gørnum.

Hvussu nógv henda skipanin kemur at kosta, er alt eftir hvussu veðrið verður. Summi ár kann skipanin kosta nakað og onnur ár helst lítið og einki. Í vetur hevði skipanin helst ikki kostað nógv.

Ein treyt fyri at koma undir hesa lóg er at mynstrað verður upp á ein sáttmála. Slíkur skrivaður einsgaldandi sáttmáli fyri útróðrarmenn kring landið er ikki galdandi. Tí verður álagt Meginfelag Útróðrarmanna at gera slíkan sáttmála, ið skal góðkennast av Føroya Landsstýri saman við Løgtingsins fiskivinnunevnd, og setir nevndin tí fram hesi

**broytingaruppskot**

Í § 1 verður 2. stk. orðað soleiðis:

*2. stk.* Mynstrað verður fyri tvey tíðarskeið:

a) fyri tíðarskeiðið frá 1. oktober til 31. december og

b) fyri tíðarskeiðið frá 1. januar til 31. mars. Uppgjørt verður fyri hvørt mynstringarskeiðið sær. Tann maður, ið hevur verið við deksfiskifari, ið lýkur treytirnar fyri at fáa minstuløn, men sum ikki hevur verið við eitt heilt mynstringarskeið, og inntøka hansara í hesum tíðarskeiði er minni enn minstalønin, hevur rætt til at fáa tann munin útgoldnan, ið svarar til tann partin av tíðarskeiðinum, hann hevur verið við deksfiskifarinum. Eru fiskipartar og onnur inntøka, herundir sjúkradagpeningur og almannahjálp v.m. í einum mynstringarskeiði minni enn galdandi minstuløn hjá mynstraðum skipsfiskimonnum í sama tíðarskeiði, verður munurin goldin úr Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna.

*3. stk.* Fyri at koma undir reglurnar í hesi lóg má maningar talið á teimum í § 1 nevndu deksfiskiførum ikki fara niður um 3 og ikki upp um 11, frokmað tein á fundi í sambandi við egning.

I § 1 formuleres stk. 2 som følger:

*Stk. 2.* Der mønstres for to tidsrum:

a) for tidsrummet fra 1. oktober til 31. december og

b) for tidsrummet fra 1. januar til 31. marts. Der foretages opgørelser for hver mønstringsperiode for sig. Den person, der har været med et dæksfiskefartøj, som opfylder betingelserne for at få mindsteløn, men som ikke har været med en hel mønstringsperiode, og hans indtægt i denne periode er mindre end mindstelønnen, har ret til at få forskellen udbetalt, der svarer til den del af perioden, han har været med dæksfiskefartøjet. Er fiskeparterne og anden indtægt, herunder sygedagpenge, og offentlig forsorg m.v. i en mønstringsperiode mindre end den mindsteløn, mønstrede dæksfartøjer opnår i samme tidsrum, betales differencen af Lønjavningsgrunden Skipsfiskimanna.

*Stk. 3.* For at komme under reglerne i denne lov må mandskabet på de i § 1 nævnte fiskefartøjer ikke være under 3 og ikke over 11, inclusivt dem der arbejder på land i forbindelse med agnarbejde.

§ 4 verður orðað soleiðis:
»§ *4.* Henda lóg kemur í gildi 1. oktober 1984, treytað av at sáttmálar verða gjørdir innan fyri M.Ú. viðvíkjandi avrokning millum bátar og manning, og hesin sáttmáli er góðkendur av Føroya landsstýri saman við Løgtingsins fiskivinnunevnd.«

§ 4 formuleres som følger:
»§ *4.* Denne lov træder i kraft 1. oktober 1984, betinget af at overenskomst indgås under Meginfelag Útróðrarmanna vedrørende afregning mellem fartøj og mandsskab, og at denne overenskomst er godkendt af Færøernes landsstyre sammen med Lagtingets Fiskeriudvalg.«

2. viðgerð 27. apríl. Adolf Hansen ynskti málið aftur í nevnd. Hetta fall við 16 atkvøðum ímóti. Málið varð sostatt aftur beint í fiskivinnunevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi

**Álit**
**II**

Fiskivinnunevndin legði fram álit í hesum máli 10. apríl 1984, og við 2. viðgerð 27. í s.m. varð málið eftir uppskoti frá Adolf Hansen beint aftur í fiskivinnunevndina.

Adolf Hansen tilráddi m.a., at allir útróðrarmenn gjøgnum e.d.v. hjá Flektron verða skrásettir, hvørjum báti teir eru við, hvørjum parti av landinum teir eru heimahoyrandi í, hvørjum lønarskeiði teir hava verið á floti í, hvussu nógv er forvunnið o.s.fr.

Eisini mælti hann til, at minstalønin verður útgoldin hvønn mánað og fyri allar mánaðirnar í árinum.

Nevndin hevur viðgjørt málið av nýggjum, og ein meiriluti (Jógvan Olsen, Fredrik Olsen, Hans M. Joensen, Tórálvur Mohr Olsen, Øssur Dam Jacobsen) leggur álitið aftur fyri løgtingið óbroytt.

Minnilutin (Juul Jacobsen) tekur undir við tilráðingini frá Adolf Hansen og mælir til, at fiskivinnunevndin arbeiðir víðari við hesum tilráðingum, og leggur fram annað uppskot um minstuløn til útróðrarmenn á Ólavsøku 1984, og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi

**uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður fiskivinunevndini at gera nýtt uppskot um minstuløn til útróðrarmenn út frá teimum tilráðingum, sum Adolf Hansen er komin við undir 2. viðgerð av hesum máli.

2. viðgerð 7. mai. § 1 varð samtykt við broyting frá nevndini við 26-0 atkvøðum, §§ 2 og 3 samtyktar við 26-0, § 4 við broyting frá nevndini samtykt við 26-0 atkvøðum, at fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 26-0 atkvøðum.

3. viðgerð 8. mai. Málið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

Lóg nr. 51 frá 28. mai 1984.

---

# 130. Lóg um »Ophævelse at lov om gennemførelse af den internationale konvention af 25. august 1924 om konnossementer.«

(Ikki framlagt).

---

# 131. Løgtingslóg um veðhald fyri láni til Nordafar A/S.

Ár 1984, týsdagin 11. apríl legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

# Uppskot

## til

**løgtingslóg um veðhald fyri láni til Nordafar A/S.**

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri einum rakstrarláni upp til 3. mió. kr. til Nordafar A/S til raksturin í 1984.

*2. stk.* Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri einum láni upp til 3 mió. kr. til at gjalda rakstrarskuld í 1983, sum restaði í at verða goldin av landskassaveðhildnum láni samb. løgtingslóg nr. 42 frá 3. mai 1983.

§ 2. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri einum láni upp til 2 mió. kr. til neyðugan rakstur av fiskiskipum, sum skulu fiska kvotuna, grønlendsku myndugleikarnir hava tillutað Nordafar A/S í 1984.

§ 3. Landsstýrinum verður heimilað saman við fíggjarnevndini landskassans vegna at veðhalda fyri rakstrarláni upp til 3 mió. kr. í samband við at Nordafar A/S ella annað hartil knýtt felag keypir trolara til landingar í Føroyingahavnini.

**lagtingslov om garnti for lån til Nordafar A/S.**

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et driftslån på op til 3 mio. kr. til Nordafar A/S til driften i 1984.

*Stk. 2.* Landssstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et lån på op til 3 mio. kr. at betale driftsgæld i 1983, som ikke kunne dækkes af det landskassegaranterede lån i henhold til lagtingslov nr. 42 af 3. maj 1983.

§ 2. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et lån på op til 2 mio. kr. til nødvendige driftsudgifter til fiskeskibe, der skal fiske kvoten, de grønlandske myndigheder har tildelt Nordafar A/S i 1984.

§ 3. Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget på landskassens vegne at garantere for et driftslån på op til 3 mio. kr. i forbindelse med at Nordafar A/S eller andet dertil knyttet selskab køber trawler til at lande i Færingehavnen.

§ 4. Herda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 4. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Nevndin fyri Nordafar A/S hevur søkt landsstýrið um veðhald fyri láni soleiðis at virksemið í Føroyingahavnini kann halda fram.

Roknað verður við at neyðugt er við einum veðhaldi uppá 3 mió. kr. fyri árið 1984.

Árið 1983 gekk so mikið vánaligt, at neyðugt er við einum veðhaldi uppá 3 mió. kr. til at gjalda uppsamlaða leysaskuld, ið ikki var umfatað av landskassaveðhaldinum fyri tað árið.

Í 1983 fekk Nordafar landskassaveðhald fyri einum láni uppá 1 mió. kr. til at tryggja raksturin av føroyskum trolarum, sum skuldu landa til Føroyingahavnina. Hetta veðhald verður mett at verða effektivt við umleið 200/300.000 kr.

Nú verður søkt um 2 mió. kr. í veðhaldi til at tryggja raksturin av trolarum, sum skulu veiða tey 3.000 tonsini, grønlendsku myndugleikarnir hava tillutað Nordafar. Eisini stendur Nordafar í boði at keypa ein grønlendskan trolara, sum hevur eina toskakvotu uppá 3.500 tons og eina kongafiskakvotu uppá 1.000 tons.

Um hetta keyp verður verunleiki, verður søkt um veðhald fyri rakstrarláni uppá 3 mió. kr.

Annars verður víst til hjálagda notat.

Veðhaldini eru treytað av, at soleingi L/F Grønlandsfelagið og Nordafar A/S skylda landskassanum pening, fær landsstýrið 60% av partapeninginum í Nordafar A/S í handveð við atkvøðurætti.

*Sí skjal 15.*

1. viðgerð 13. apríl. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fyri løgtingið av landsstýrinum 11. apríl og við 1.viðgerð, sum fór fram 13. í s.m., varð tað beint í marknaðarnevndina, sum hevur viðgjørt málið.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Agnar Nielsen, Jógvan Sundstein, Olaf Olsen, Jørgen Thomsen og Hilmar Kass) førir fram:

Við útflyting av fiskimarki okkara broyttust vinnumøguleikarbir bæði nær og fjar. Heima á landi kom at vera meira arbeiði, tí meira varð fiskað í føroyskum sjógvi, meðan tvørligt gjørdist á fjarleiðum har ímillum í Grønlandi.

Tað hevur verið hildið neyðugt hjá føroyingum at søkja sær vinnumøguleikar í øðrum londum, serstakliga á sjónum, men eisini í ein ávísan mun á landi. Hetta hevur munað væl í føroyska landsbúskapinum.

Ásannast má, at spurningurin viðvíkjandi Nordafar er ein samfelagsuppgáva, tí her hómast framtíðarmøguleikar.

Grønland fer burtur úr EF 1. januar 1985. Vónandi verður tá lættari við samráðingum millum grønlendskar og føroyskar myndugleikar at finna útvegir fyri øktum samarbeiði. Tað kann tá vera heppið fyri føroyingar at eiga hesi vinnutól á landi í Grønlandi.

Meirilutin ásannar, at støðan viðvikjandi fiskirættindum í fremmandum sjógvi er rættiliga góð í ár, men veiðitrýstið á føroysku grunnarnar er ógvuliga stórt. Um tað eydnast at fáa einar tríggjar av okkara ísfiskatrolarum at fiska frá støðini í Grønlandi í summar, so hevði tað minkað trýstið á okkara egnu grunnar. Eisini er vert at nevna, at til hesa veiðu verður bert latin oljustudningur, meðan einki verður goldið úr ráfiskagrunninum, so her verður nakað av peningi spart.

Einir 50 føroyingar fara at starvast á støðini í summar, um hon verður opin.

Eftir teim upplýsingum, sum eru til taks, so eru grønlendingar sera áhugaðir fyri, at støðin verður latin upp í ár, tí so fáa teir møguleikar at avreiða har, og munandi arbeiði verður til grønlendingar á støðini.

Tað er líkt til, at um føroyingar ikki gera brúk av teim møguleikum, sum grønlendskir myndugleikar hava latið føroyingum, so verður neyvan lætt í fyrstu framtíð at fáa økt fiskirættindini í grønlendskum sjógvi.

Í fleiri ár hevur landsstýrið við heimild frá løgtinginum veðhildið fyri rakstrarlánum til Nordafar A/S. Hesi lán eru gjaldskomin.

Senasta ár veðhelt landið eisini fyri einum láni, sum var 1 milj. kr. til at tryggja føroyskar trolarar, sum veiddu í Grønlandi.

Í ár verður biðið um veðhald fyri somu upphædd sum í fjor til rakstrarlán. Veðhaldið fyri at tryggja tað starvið hjá føroyskum trolarum, ið skulu fiska til Nordafar, er tvívaldað, men loyvda veiðan

er trífaldað, so fleiri trolarar mugu fiska í Grønlandi, um loyvda veiðunøgdin skal fiskast.

Fyri fyrstu ferð verður biðið um veðhald fyri láni at gjalda rakstrarskuld frá árinum fyri. Orsøkin er tann, at landið í fjør veðhelt fyri einum rakstrarláni, sum var 3 mió. kr., men rakstrarhallið var út við 6 mió. kr.

Landsstýrið biður eisini um heimild saman við fíggjarnevndini at veðhalda fyri einum rakstrarláni til ein trolara, sum er í umbúna at keypa.

Føroyskir politikkarar hava sett sær sum mál at fáa í lag størri samvinnu millum londini í Norðuratlantshavinum.

Nordafar hevur verið og er eitt bindilið millum Grønland og Føroyar, og orsøkin til at flestu føroyskir politikkarar hava hildið tað verið rætt við framhaldandi veðhaldum man vera, at hetta hevur verið roknað týdningarmikið samband millum londini, sum vónandi sum frá leið, kundi verið báðum tjóðum at gagni, hóast fíggjarliga úrslitið hjá Nordafar í løtuni er sera dapurt.

Hóast Grønlandsfelagið stendur sum eigari av Nordafar við teim skerjingum, sum eru í uppskoti landstýrisins, so er tað landið, sum tekur alla ábyrgdina av framhaldandi rakstri. Tað er tí rímiligt, at løgtingið velur flestu nevndarlimirnar.

Í løtuni eru 10 nevndarlimir, 4 grønlendingar og 6 føroyingar, valdir av Grønlandsfelagnum.

Meirilutin mælir til, at afturat treytini hjá landsstýrinum um, at 60% av partapeninginum í Nordafar A/S í handveð við atkvøðurætti, verður sett, at løgtingið velur 5 av teim føroysku nevndarlimunum og Grønlandsfelagið tann cina, og at løgtingið velur síni umboð nú og áleggur Nordafar at halda aðalfund, so skjótt sum lógir og viðtøkur loyva hesum, fyri at nýggja nevndin sum skjótast kann taka sær av leiðsluni í summar.

Hetta er í samsvar við løgtingssamtykt frá 18. mai 1983: »Landsstýrinum verður álagt í tingsetuni 1983/84, uttan innan 1. december 1983, at leggja fram fullfíggjaða frágreiðing um virksemið í Føroyingahavnini og lógaruppskot, sum fær ognarviðurskiftini viðvíkjandi Nordafar-virkinum umskipað so, at atkvøðurætturin viðvíkjandi viðurskiftum felagsins kemur at liggja har, sum ábyrgdin nú liggur, nevniliga hjá Føroya Løgtingi.« Hetta uppskotið til samtyktar varð samtykt við 18-0 atkvøðum.

Við teim upplýsingum, sum eru tøkar, er meirilutin ikki førur fyri at meta um veðhald fyri rakstrarláni til trolaran, sum hugsað

verður um at keypa, men hann tekur undir við at heimila landsstýrinum saman við fíggjarnevndini at taka avgerð í hesum máli, tá tað er betur lýst.

Út frá tí, ið her er ført fram, mælir meirilutin til at samtykkja uppskot landsstýrisins, men setir tó fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

| | |
|---|---|
| § 4. Veðhaldini eru treytað av, at solcingi L/f Grønlandsfelagið og Nordafar A/S skylda landskassanum pening, fær landsstýrið 60% av partapeninginum í Nordafar A/S í handveð við atkvøðurætti, og at løgtingið velur 5 av teimum føroysku nevndarlimunum og L/f Grønlandsfelagið ein nevndarlim. | § 4. Garantierne er betinget af, at sålænge landskassen har penge tilgode hos L/f Grønlandsfelagið og Nordafar A/S, får landsstyret overdraget 60% af aktiekapitalen som håndpant med stemmeret, og at lagtinget vælger 5 af de færøske bestyrelsesmedlemmer og L/f Grønlandsfelagið 1 bestyrelsesmedlem. |
| § 4 verður broytt til § 5. | § 4 ændres til § 5. |

Minnilutin (Petur Reinert) setir fram soljóðandi:

Orsøkin til, at Tjóðveldisflokkurin skeyt upp, at málið var viðgjørt í marknaðarnevndini, var tann, at flokkurin helt, at hetta afturvendandi mál átti at verið viðgjørt í samljóð við teir fiskiveiðumøguleikar, sum vit kundu fáa í Grønlandi, nú aftaná at tað er greitt, at Grønland fer burtur úr EEC 1. januar 1985. Á fundinum í marknaðarnevndini varð hesin spurningur eisini umrøddur, og kundu vit frá landsstýrinum ikki fáa nakra vissu, ei heldur nakra grundaða vón um, at viðurskifti okkara til veiðumøguleikar í Grønlandi vildu broytst nakað til tað betra í næstu framtíð.

Samstundis setti flokkurin fram spurningar, um fíggjarligu gongdina í hesum felagi. Eitt nú hvussu mikið verður goldið fyri ráfiskin, hvussu stór arbeiðsløgnin er, og hvør stendur fyri søluni, og á hvønn hátt hon er skipað.

Ongar av hesum spurningum fekk flokkurin svar uppá, og fingu vit í Tjóðveldisflokkinum ta fatan, at meirilutin í marknaðarnevndini vildi lata henda felagsliga og fíggjarliga hurlivasa, sum eitur Nordafar halda fram eftir somu skeivu kós sum higartil.

Minnilutin setir tí í fyrsta lagi fram

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

I. at tingið vísir uppskotið aftur í marknaðarnevndina til nærri kanningar, so allir ivaspurningar eru klárlagdir,
II. at einki arbeiði fer fram í Føroyingahavnini hjá Nordafar fyrr enn viðurskifti okkara við Grønland eru komin í púra greiða legu,
III. at einki virksemi fer í gongd hjá Nordafar í ár, fyrrenn alt felagið bæði fíggjarliga og vinnuliga er kannað, og uppskot um nýskipan er løgd fyri tingið um ábøtur og umskipan av stjórnan og rakstur av felagnum.

2. viðgerð 7. mai. § 1 varð samtykt við 23-1 atkvøðum, §§ 2 og 3 samtyktar við 23-0, broyting frá nevndini til § 4 samtykt við 24-0, § 5 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 23-0 atkvøðum. Uppskotini til samtyktar frá Tjóðveldisflokkinum I, II og III fullu ávikavist við 8-0, 8-0 og 7-0.

8. mai legði Tjóðveldisflokkurin fram soljóðandi

**broytingaruppskot**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Marknaðarnevndini verður álagt sum millumtinganevnd at fyriskipa nágreiniliga kanning av øllum viðurskiftum innan rakstur og stjórnan av Nordafarstøðini í Føroyingahavnini og leggja úrslitini av hesum kanningum fyri nýggju nevndina í Nordafar, sum fær álagt at gera rakstur og stjórnan so bíliga sum tilber.

Úrslitið av hesum kanningum má fyriliggja, áðrenn landsstýri og fíggjarnevnd taka støðu til møguligt trolarakeyp í samband við raksturin av rakstrinum.

Áðurnevndu kanningar saman við framtíðaráætli fyri Nordafarstøðina rakstrarliga verður lagt fyri tingið í Ólavsøkutingsetuni í ár.

3. viðgerð 8. mai. Málið endaliga samtykt við 23-7 atkvøðum. Broytingaruppskotið fall við 14-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1408-4-3. Lóg nr. 52 frá 30. mai 1984.

---

# 132. Eykastudningur til áísar havnavíðkanir.

Ár 1984, týsdagin 11. apríl legði Páll Vang, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram sojóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um eykastudning til ávísar havnavíðkanir.**

§ 1. Sum uppískoyti til tær játtanir, sum við løgtingslóg nr. 44 frá 23. juni 1978: Løgtingslóg um 6 ára ætlan fyri útbygging av havnunum, og løgtingslóg nr. 64 frá 23. juni 1983: Løgtingslóg um eykastudning til ávísar havnavíðkanir, vórðu veittar til víðkan av havnunum í niðanfyri nevndu kommunum, verður úr landskassanum veittur studningur svarandi til 65% av tí upphædd, byggiútreiðslurnar til avvarandi havnavíðkan verða hægri enn tann í omanfyri nevndu løgtingslógum tilskilaða størsti studningsborni byggipeningur, tó í mesta lagi 65% av niðanfyri tilskilaðu upphæddum.

Studningurin fellur til gjaldingar í fíggjarárinum 1985/86:

| *Kommuna* | *1.000 kr.* |
|---|---|
| Klaksvíkar | 2.000 - |
| Leirvíkar | 10.000 - |
| Vestmanna | 2.000 - |
| Nólsoyar | 2.000 - |
| Hvalbiar | 2.000 - |
| | 18.000 kr. |

§ 2. Ásetingarnar í §§ 3, 4 og 5 í løgtingslóg nr. 44 frá 23. juni 1978 eru eisini galdandi fyri byggingar framdar við studningi sambært hesi løgtingslóg.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

**Forslag**

**til**

**lagtingslov om tillægsbevilling til visse havneudvidelser.**

§ 1. Som tillæg til de bevillinger, der ved lagtingslov nr. 44 af 23. juni 1978: Lagtingslov om 6 års plan for udbygning af havnene og lagtingslov nr. 64 af 23. juni 1983: Lagtingslov om tillægsbevilling til visse havneudvidelser, blev ydet til udvidelse af havnene i nedennævnte kommuner, ydes der af landskassen tilskud svarende til 65% af det beløb, anlægsudgifterne for pågældende havneudvidelse overstiger den i ovennævnte lagtingslove anførte maksimale tilskudsberettigede byggesum, dog højst 65% af nedenfor anførte beløb.

Tilskudet forfalder til betaling i finansåret 1985/86:

| *Kommune* | *1.000 kr.* |
|---|---|
| Klaksvíkar | 2.000 - |
| Leirvíkar | 10.000 - |
| Vestmanna | 2.000 - |
| Nólsoyar | 2.000 - |
| Hvalbiar | 2.000 - |
| | 18.000 kr. |

§ 2. Bestemmelserne i §§ 3, 4 og 5 i lagtingslov nr. 44 af 23. juni 1978 er også gældende for anlæg udført med tilskud i henhold til denne lagtingslov.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Í fjør játtaði tingið, sambært løgtingslóg nr. 64 frá 23. juni 1983: Løgtingslóg um eykastudning til ávísar havnaviðkanir, studning til nakrar kommunur, har havnaútbyggingin gjørdist so kostnaðarmikil at 6 ára ætlanin ikki røkk. Tá varð roknað við, at ein nýggj havnaætlan fór at verða framløgd og samtykt á vári 1984; men av tí at einki uppskot til nýggja havnaætlan verður lagt fram í hesi tingsetuni, verður neyðugt at játta ávísum kommunum nakað av studningi, soleiðis at arbeiði, ið eru í gerð, ikki skulu steðga í hálvum gekki, og at bráðneyðug arbeiði kunnu verða byrjað í summar.

Niðanfyri er greitt frá, hvør høvuðsorsøkin er til eykajáttanina til ta einstøku kommununa:

**Klaksvíkar kommuna**
Útbyggingin av Klaksvíkar havn sambært 6 ára ætlanina er fyri tað mesta farin fram á vestursíðuni í Klaksvík. Henda útbygging er um at verða liðug. Ætlanin varð, at 6 ára ætlanin eisini skuldi røkka til at skapa møguleikar fyri at flyta oljugoymslurnar út úr býnum, men nú sæst, at játtanin røkkur ikki. Tað er av stórum týdningi, at planeringin av nýggjum oljugoymsluøki og bygging av oljubryggju við Grótrætt verður byrjað í summar.

Ætlanin er at nýta avlopið av 6 ára ætlanini til hesa bygging, men o.u. 2. mió. kr. koma at resta í.

**Leirvíkar kommuna**
Størsti parturin av grótinum úr Leirvíkar tunnlinum er nýttur til ffyllu í tann nýggja brimgarðin í Leirvík. Ætlanin er at leggja eina nýggja ferjulegu inn við hesum brimgarði og møguleikar verða eisini fyri at víðka Leirvíkarhavn við einum nýggjum havnarhyli norðan fyri hann, ið er.

Fyri at fáa eina góða havn er rættast at gera brimgarðin o.u. 100 m longri enn tað hann nú er. Arbeiðið er í gerð og fyri at tað ikki skal steðga, verður neyðugt at játta stuðul til Leirvíkar kommunu. Vit skjóta upp 10 mió. kr.

**Vestmanna kommuna**
Ætlanin hevur leingi verið at flyta ferjuleguna inn á Fitjarnar ella Fjørð og í fjør játtaði tingið, sambært løgtingslóg nr. 64 frá 23. juni 1983, 5 mió. kr. til hetta endamál. Nú hetta mál er nærri kannað sæst, at 5 mió. kr. er ov lítið. Kommunan streingir á at fáa hetta mál framt, tí ferðslan ígjøgnum bygdina er ótolandi. Fyri at kunna byrja sum skjótast skjóta vit upp at játta 2 mió. kr. í eykastudningi.

**Nólsoyar kommuna**
Arbeiðið viðvíkjandi meiri atløguplássi og dýping í havnini í Nólsoy er í gerð og bryggjurnar eru lidnar, men nakað er eftir at dýpa.

Ynski eru frammi um at fáa meira dýpt, soleiðis at umstøðurnar hjá skipum at leggja at og fara frá verða betri. Neyðugt verður við 2 mió. kr. afturat í studningi.

**Hvalbiar kommuna**
Í ódnini 22. januar í ár fekk brimgarðurin í Hvalba stóran skaða. Hesin skaði verður nú umvældur samtíðis sum nýggj bryggja verður gjørd. Nú bryggja verður gjørd á innsíðuni á brimgarðinum verður brimgarðurin bygdur uppaftur eitt sindur øðrvísi enn hann var undan skaðanum. Hetta førir við sær o.u. 2 mió. kr. í eykaútreiðslum og verður tí skotið upp at játta Hvalbiar kommunu 2 mió. kr. í eykastudningi.

1. viðgerð 13. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 8. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 11. apríl 1984 og undir 1. viðgerð tann 13. s.m. beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í 6 minnilutar.

Nevndin hevur hildið fund við M. Helmsdal, landsverkfrøðing. Støðutakanin hjá fíggjarnevndarlimunum til uppskot landsstýrisins er henda:

Minnilutin (Ivan Johannesen og Sv. Åge Ellefsen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins við teirri broyting, at tikið verður ikki undir við at játtaðar verða 2 mió. kr. til Vestmanna kommunu, men at hesin peningur verður tøkur til gerð av ferjulegu við Norð-

arugjógv við Vestmannasund. Víst verður til skriv frá Landsverkfrøðinginum dagfest 28. apríl 1984, har sett eru upp 3 uppskot um kostnaðarsíðuna av slíkum projekti.

Nevndi minniluti hevur undir viðgerðini víst á teir fyrimunir, ið eitt slíkt uppskot inniber fyri ferðasambandið Streymoy-Vágar.

Í skrivi frá 26. apríl 1984 hava valfeløgini fyri Fólkaflokkin, Sambandsflokkin, Sjálvstýrisflokkin, Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin heitt á løgtingið um at fremja nevnda projekt.

Í skrivum dagfest 11. apríl 1984 hava Sandavágs, Miðvágs, Sørvágs og Bíggjar kommunur eisini heitt á løgtingið um at stuðla hesum máli og hava serliga víst á sparing í samlaðum fløgukostnaði, rakstrarkostnaði og ikki minst í tíð, at eitt slíkt projekt verður framt.

Í skrivi frá 4. apríl 1984 hava vinnuvirki í Vágum sent somu áheitan til løgtingið. »Bólkurin av áhugaðum« v/ Jóanes Nielsen, Sandavági, hevur í skrivi frá 30. apríl 1984 -utvegað yvir 500 undirskriftir til frama fyri omanfyri nevndu søk.

Nevndi minniluti setur sostatt fram soljóðandi

**uppskot**

**til**

**løgtingslóg um ferðasambandið Streymoy-Vágoy.**

**§ 1.** Tá ið ferjulegan, ið nú er á Heyganesi í Vestmanna, skal flytast, verður hon flutt út í Vestmannasund við Norðarugjógv.

*2. stk.* Peningurin, ið er avsettur til flytan av ferjuleguni sambært stk. 1, eins og tann peningur, ið játtaður var til endamálið sambært løgtingslóg nr. 64 frá 23. juni 1983, verður at nýta til ferjuleguna við Norðarugjógv.

**§ 2.** Henda lóg fær gildi beinan vegin.

**lagtingslov om trafikforbindelsen Strømø-Vågø.**

**§ 1.** Såfremt færgelejet på Heygnes flyttes, flyttes dette til Norðarugjógv ved Vestmannasund.

*Stk. 2.* Bevillingen til flytning af færgelejet i henhold til stk. 1, såvel som den bevilling, der er givet i henhold til lagtingslov nr. 64 af 23. juni 1983 skal anvendes til færgelejet ved Norðarugjógv.

**§ 2.** Denne lov træder i kraft straks.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins óbroytt.

Minnilutin (Atli P. Dam) tekur støðu í tingsalinum.

Minnilutin (Øssur Dam Jacobsen) viðmerkir:
Flytan av ferjuleguni í Vestmanna er ein sera átroðkandi spurningur, sum fyri langt síðan skuldi verið loystur. Landsverkfrøðingurin hevur í fíggjarnevndini upplýst, at einki verunligt projekt fyriliggur um ferjulegu við Norðarugjógv. Tað er tí harmiligt, at tað enn eina ferð verða gjørdar royndir, sum forða fyri, at hetta arbeiði verður gjørt fyribils.
Nevndi minniluti mælir tí til at taka undir við uppskoti landsstýrisins óbroytt.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins men mælir til, at tingið eisini játtar umframt:

| | |
|---|---|
| 1. *Sands* kommunu (at nýta til dýping) | kr. 3.000.000,- |
| 2. *Runavíkar* kommunu (at nýta inni við Bakka) | kr. 3.000.000,- |
| 3. *Skála* kommunu (at nýta til pullertar — sí skriv 25/2-1984 — Landsverkfrøðingsjournal nr. 1282) | kr. 500.000,- |

og setur sostatt fram soljóðandi

**broytingaruppskot**

til uppskot landsstýrisins:

| Í § 1 verður sett aftrat: | | 1 § 1 tilføjes: | |
|---|---|---|---|
| *Kommuna* | *1.000 kr.* | *Kommune* | *1.000 kr.* |
| Sand | 3.000 | Sand | 3.000 |
| Runavík | 3.000 | Runavík | 3.000 |
| Skála | 500 | Skála | 500 |
| Ialt | 24.500 | Ialt | 24.500 |

Minnilutin (Asbjørn Joensen) setir einki uppskot fram.

2. viðgerð 9. mai. Málið varð aftur beint í fíggjarnevndina, sum sama dag legði fram soljóðandi

**Álit**
**II**

Undir 2. viðgerð varð málið beint aftur í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og 3 minnilutar.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen, Asbjørn Joensen og Atli Dam) vísir til viðmerkingarnar í fyrra álitinum og setir fram fylgjandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

1. Løgtingið samtykkir at áleggja landsstýrinum áðrenn ólavsøku at gera nøgdugar kanningar av lendingarviðurskiftunum við Norðarugjógv (kyrru, streym o.tl.),
2. at gera projekt og kostnaðarmetingar av vegi, verjugarði og ferjulegu á nevnda plássi.
3. at leggja úrslitið av hesum kanningum og útrokningum fyri løgtingið á ólavsøku 1984.
4. Samsvarandi omanfyri nevnda samtykkir løgtingið at bíða til ólavsøku við at taka støðu til endaliga játtan.

Ivan Johannesen og Åge Ellefsen taka samstundis lógaruppskot sítt í fyrra álitinum aftur.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) tekur undir við I) - 3) í meirilutaálitinum til samtyktar.

Minnilutin (Øssur Dam Jacobsen) viðmerkir:

Fyri einum ári síðani var eitt uppskot til samtyktar samtykt um at kanna ymiskar loysnir innan ferðasambandið um Vestmannasund.

Hesar kanningar góvu tað úrslit, at landsverkfrøðingurin mælti til at flyta ferjuleguna í Vestmanna inn á Fjørð beinanvegin. Upp-

skot er samtykt um at gera kostnaðarætlan um fast samband um Vestmannasund. Tað kann tí ikki góðtakast, at hetta átrokandi arbeiðið í Vestmanna enn einaferð verður útsett orsakað av nýggjum kanningum um ferjulegu úti á sundinum. Hetta kann bygdin Vestmanna ikki liva við.

Minnilutin (Øssur Dam Jacobsen) heldur tí fast við tilmælið um at samtykkja uppskot landsstýrisins óbroytt uttan aðrar viðmerkingar.

Minnilutin (Atli Dam, Ove Mikkelsen og Adolf Hansen) mælir til fylgjandi uppískoyti til lógaruppskot landsstýrisins:

1. *Sands kommuna*
   (at nýta til dýping) ..... kr. 3.000.000
2. *Runavíkar kommuna*
   (at nýta inni við Bakka) ..... - 3.000.000
3. *Skála kommuna*
   (at nýta til pullertar, jbr. skr. 25/2-84 ..... - 500.000

Framhaldandi 2. viðgerð 9. mai. Landsstýrisins uppskot § 1 varð samtykt við 24-0, § 2 við 25-0 og § 3 uttan atkvøðugreiðslu. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 26-0 atkvøðum. Broytingaruppskot til pkt. 1, 2 og 3 fall við 14-0.

3. viðgerð 9. mai. Málið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1811-18. Lóg nr. 58 frá 5. juni 1984.

# 133. Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna.

Ár 1984, týsdagin 11. apríl legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.**

§ 1. Við tí endamáli at gera Lønjavningargrunn Skipsfiskimanna føran fyri at veita manningini, her at skilja sum eisini skipari ella bátsformaður, á føroyskum fiskifari minstuløn og at veita annan stuðul til fiskivinnuna, verður á fíggjarløgtingslógunum veittur grunninum árligur studningur.

*2. stk.* Lønjavningargrunnurin setir í reglugerð tær gjøllaru reglurnar fyri minstulønini og hinum stuðlunum. Reglugerðin verður at senda landsstýrinum til góðkenningar.

**lagtingslov om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet.**

§ 1. Med det formål, at Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna er i stand til at yde besætningen, i denne lov omfattende også skipper eller bådsformand, på færøsk fiskerfartøj mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet, bevilges der fonden årligt tilskud på finanslagtingetsloven.

*Stk.* 2. Lønjavningargrunnurin fastsætter i et reglement de nærmere bestemmelser for mindstelønnen og tilskudene. Reglementet forelægges landsstyret til godkendelse.

**Minstaløn og minstiforvinningur.**

§ 2. Treyt fyri, at persóni er tryggjað minsta løn, er, at hann er mynstraður eftir sáttmála millum Føroya Reiðarafelag og viðkomandi yrkisfelag. Er eingin tílíkur sáttmáli, er treytin fyri minstuløn, at mynstrað er eftir sáttmála ímillum viðkomandi reiðara ella skipaeigara og viðkomandi yrkisfelag. Í undantaksførum hevur landsstýrið heimild at gera frávik.

§ 3. Minstaløgin er pr. 1. apríl 1984 kr. 9.900,00 um mánaðin, hvør veiðuferð verður roknað fyri seg. Minstaløgin verður ikki skerd av manningarstudningunum eftir hesi lóg. Minstaløgin verður hækkað við 105 kr. um mánaðin fyri hvørji 3 stig, prístalið er oman fyri 100. Fellur prístalið niður um 100, verður eingin prístalsviðgerð. Dýrtíðarviðgerðin fer fram hvønn ársfjórðing eftir prístalinum 1. í ársfjórðinginum.

*2. stk.* Til fiskimann, ið mynstraður er fyri minni enn fullan part, verður minstaløn veitt sum ein lutfalsligur partur av fullari minstuløn.

**Mindsteløn og mindsteindtægt.**

§ 2. Det er en forudsætning for, at der er sikret en person mindsteløn, at denne er påmønstret i henhold til aftale mellem Føroya Reiðarafelag og vedkommende fagforening. Såfremt en sådan overenskomst ikke foreligger, er mindstelønnen betinget af, at der er mønstret efter aftale mellem vedkommende reder eller ejer af skibet og vedkommende fagforeninger. I særlige tilfælde har landsstyret bemyndigelse til at dispensere.

§ 3. Mindstelønnen er pr. 1. april 1984 kr. 9.900,00 om måneden, hver fisketur beregnet for sig. Mindstelønnen reduceres ikke ved mandskabstilskuddene i henhold til denne lov. Mindstelønnen forhøjes med 105 kr. om måneden for hver 3 point, pristallet overstiger 100. Falder pristallet under 100, finder ingen pristalsregulering sted. Dyrtidsreguleringen finder sted hvert kvartal efter pristallet den 1. i kvartalet.

*Stk. 2.* Til fisker, der er påmønstret for mindre end en hel anpart, ydes mindsteløn som en forholdsmæssig del af fuld mindsteløn.

§ 4. Manningini á føroyskum deksfari undir 100 brutto skrásett tons á útróðri innanfyri 100 fjórðingar úr landi í Føroyum, verður, um hon ikki er undir minstulønarskipan, tryggjað ein minstaforvinning. Minstiforvinningurin er pr. 1. aprfl 1984 749,30 kr. til hvønn mannin fyri hvønn útróðrardagin.

*2. stk.* Manningin á opnum báti verður tryggjað ein minstiforvinningur av somu stødd sum í 1. stk., tó tá talan er um snelluveiddan fisk, bert hálvan minstaforvinning treytað av at viðkomandi persónur hevur havt minst 40% av skattainntøku síni stavandi frá útróðri ári fyri, og at hesin framhaldandi rekur somu vinnu í ikki minni mát enn áður.

*3. stk.* Treyt fyri skipanini í 1. og 2. stk. er, at fiskifarið hevur avreitt, at manningin verður avroknað, og at fiskifarið er mannað, í báðum førum, sum vanligt er á staðnum.

*4. stk.* Lønjavningargrunninum verður heimilað at útvega neyðugar upplýsingar til fyrisiting av avvarðandi vinnufelag/fólk og stovnar hava skyldu at lata neyðugt prøvtilfar í samband við útinningina av hesum stuðulsreglum.

*5. stk.* Minstiforvinningurin verður hækkaður við 9,60 kr. fyri hvørji 3 stig, prístalið er oman fyri 100. Fellur prístalið niður um 100, verður eingin

§ 4. Der sikres mandskabet på færøsk dæksfiskerfartøj under 100 brutto reg. tons i hjemmefiskeri inden for 100 sømil fra land af Færøerne, såfremt mandskabet ikke er under mindstelønsordning, en mindsteindtægt. Mindsteindtægten er pr. 1. april 1984 749,30 kr. til hver af mandskabet for hver fiskedag.

*Stk. 2.* Der sikres mandskabet på åben fiskerbåd en mindsteindtægt af samme størrelse som den i stk. 1, dog når der er tale om fisk, der er fanget med snelle, kun halv mindsteindtægt, betinget af, at vedkommende person har haft i det mindste 40% af sin skatteindtægt hidrørende fra hjemmefiskeri det foregående år, og at denne person fremdeles driver samme hovederhverv i ikke mindre omfang end tidligere.

*Stk. 3.* Det er en forudsætning for ordningen i henhold til stk. 1 og 2 at fiskerfartøjer har indhandlet, at mandskabet afregnes, og at fiskerfartøjet er bemandet, i begge tilfælde som det er sædvanligt på stedet.

*Stk. 4.* Lønjavningargrunnurin har hjemmel til at tilvejebringe de nødvendige oplysninger til administration af støtten efter stk. 1 og 2, vedkommende fagforening, personer og institutioner har pligt til at udlevere nødvendigt bevismateriale i denne forbindelse.

prístalsviðgerð. Dýrtíðarviðgerðin fer fram hvønn ársfjórðing eftir prístalinum 1. í ársfjórðinginum.

*Stk. 5.* Mindsteindtægten forhøjes med 9,60 kr. for hver 3 point, pristallet overstiger 100. Falder pristallet under 100, foretages ingen pristalsregulering. Dyrtidsreguleringen sker hvert kvartal i henhold til pristallet den 1. i kvartalet.

**Manningarstudningur.**

**§ 5.** Til manningina á føroyskum fiskifari verða veittir hesir studningar roknaðir av uppvigaðari vekt:

a. á trolara í saltfiska veiðu 25 oyru/kg saltfisk,
b. á skipi við línu, gørnum, snøri ella snellu í saltfiskaveiðu 125 oyru/kg saltfisk,
c. á frystiskipi í svartkalva og/ella hemaraveiðu 90 oyru/kg,
d. á trolara í flakaveiðu (svartkjaftaveiða undantikin) 25 oyru/kg av flaki,
e. á trolara í svartkjaftaveiðu 50 oyru/kg av flaki og farsi,
f. á deksfiskifari upp til 110 brutto skrásett tons við línu ella snellu á feskfiskaveiðu 50 oyru/kg, tó fyri brosmu og longu 60 oyru/kg.
g. á línuskipum yvir 110 brutto skrásett tons 120 oyru/kg.
h. á trolara á feskfiskaveiðu 5 oyru/kg,
i. við gørnum á feskfiskaveiðu 30 oyru/kg.
j. á opnum útróðrarbáti 50

**Mandskabstilskud.**

**§ 5.** Til mandskbet på færøsk fiskerfartøj ydes disse tilskud beregnet af indvejet vægt:

a. På trawler i fiskeri efter saltfisk 25 øre/kg saltfisk,
b. på skib med line, garn, snøre eller snelle i fiskeri efter saltfisk 125 øre/kg saltfisk,
c. på fryseskib i fiskeri efter hellefisk og/eller haj 90 øre/kg,
d. på trawler i filétfiskeri (blåhvillingsfiskeri undtaget) 25 øre/kg filét,
e. på trawler i blåhvillingsfiskeri 50 øre/kg filét og fars,
f. på dæksfiskerfartøj op til 110 brutto reg. tons med line eller snelle efter frisk fisk 50 øre/kg, dog for brosme og lange 60 øre/kg.
g. på lineskibe over 110 brutto reg. tons 120 øre/kg.
h. på trawler på ferskfiskeri 5 øre/kg,
i. med garn på ferskfiskeri 30 øre/kg.
j. på åbne både 50 øre/kg. Har

oyru/kg. Hevur báturin bensinmotor, verður latið 9 oyru/kg eyka í studningi,

k. á fiskifari undir 12 brutto skrásett tons, ið avreiðir sild ella brisling frá føroyskum firði til agn, frystingar ella saltingar 25 oyru/kg. Fyri hvørja ferð avreiðingarprísurin hækkar við 10 oyrum/kg í meðal, lækkar studningurin við 1 oyra/kg. Studningurin fyri kg kann tó ikki verða hægri enn avreiðingarprísurin. Er talan um bát við bensinmotori, er studningurin 5 oyru/kg hægri.

*2. stk.* Í teimum undir 1. stk. punkt f. og j. nevndu førum, har veiðan verður avreidd ella uppskipað á plássum, har møguleikar ikki eru at virka veiðuna alla ella part av henni, og tann parturin, sum ikki kann virkast, beinanveg verður fluttur til fiskavirki, verður latið 20 oyru/kg eyka fyri henda partin av veiðuni. Studningur verður latin honum, ið ber kostnaðin av flutningunum. Landsstýrið saman við fíggjarnevndini fyrisetir í reglugerð fyrisitingina av flutningsskipanini.

**Rakstrarstudningur.**

**§ 6.** Til eigara av føroyskum fiskifari verða veittir hesir studningar roknaðir av uppvigaðari vekt í fiskiskapi:

båden benzinmotor, ydes yderligere 9 øre/kg i tilskud,

k. på fiskerfartøj under 12 brutto reg. tons, der indhandler sild eller brisling fra færøsk fjord til agn, frysning eller saltning 25 øre/kg. Hver gang indhandlingsprisen stiger med 10 øre/kg i middel, reduceres tilskudet med 1 øre/kg. Tilskuddet pr. kg kan dog ikke være højere end indhandlingsprisen. Er fiskeriet udøvet fra båd med benzinmotor, er tilskudet 5 øre/kg højere.

*Stk. 2.* Under de i stk. 1, pkt. f. og j. nævnte tilfælde, hvor fangsten indhandles eller ilandbringes på steder, hvor der ikke er mulighed for at tilvirke hele fangsten eller en del af denne, og den del, der ikke kan tilvirkes, straks transporteres til fiskerianlæg, ydes 20 øre/kg ekstra for denne del af fangsten. Tilskud ydes den, der bærer udgiften af transporten. Landsstyret sammen med finansudvalget fastsætter i reglement administrationen af transportordningen.

**Driftstilskud.**

**§ 6.** Til ejer af færøsk fiskerfartøj ydes disse tilskud af indvejet vægt i fiskeri:

a. við línu og gørnum á saltfiskaveiðu 50 oyru/kg saltfisk,
b. eftir svartkalva og/ella á hemaraveiðu 90 oyru/kg,
c. við trolara á svartkjaftaveiðu 50 oyru/kg av flaki og farsi,
d. við trolara, sum hevur ella kann fáa veiðuloyvi uttan fyri landleiðina, til saltfiska-, frysti- ella ísfiskaveiðu, á feskfiskaveiðu á landleiðini í útlendskum ella altjóða sjógvi 8 oyru/kg, tó fyri brosmu, longu, blálongu, upsa, kongafisk og svartkalva, 47 oyru/kg, um hesi fiskasløgini eru veidd á landleiðini.
e. við trolara við upp til 1400 hk. høvuðsmaskinu, sum ikki kemur undir fyrisetingarnar í punkt d. á feskfiskaveiðu á føroysku landleiðini uttan fyri 12 fjórðingar úr grundlinjunum, og trolarar á ídnaðarveiðu við feskfiski sum hjáveiðu, av hesi veiðu 36 oyru/kg, tó fyri brosmu, longu, blálongu, upsa, kongafisk og svartkalva 133 oyru /kg, um hesi fiskasløg eru veidd á føroysku landleiðini. Fyri trolarar við høvuðsmaskinu uppá 1400 hk. ella har yvir, verður studningurin ávikavist 43 oyru/kg og 140 oyru/kg.,
f. við fiskifar sum hevur trol-

a. med line og garn i fiskeri efter saltfisk 50 øre/kg saltfisk,
b. efter hellefisk og/eller haj 90 øre/kg,
c. med trawler på blåhvillingfiskeri 50 øre/kg af filét og fars,
d. med trawler, som har eller kan opnå fiskeritilladelse udenfor fiskeriterritoriet til fiskeri efter saltfisk, frossen fisk eller isfisk, på fiskeri efter fersfisk på fiskeriterritoriet, udenlandsk eller internationalt soterritorium 8 øre /kg, dog for brosme, lange, blålange, gråsej, rødfisk og hellefisk, 47 øre/kg, såfremt disse fiskearter er fisket på fisketerritoriet,
e. med trawler op til 1400 hk hovedmaskineri, som ikke kan henføres under forudsætningerne i pkt. d. i fiskeri efter ferskfisk på det færøske fisketerritorium udenfor 12 sømil fra grundlinjerne og trawlere på fiskeri efter industrifisk med ferskfisk som bifangst, af denne fangst 36 øre/kg, dog for brosme, lange, blålange, gråsej, rødfisk og hellefisk 133 øre/kg, såfremt disse fiskearter er fanget på fisketerritoriet. For trawlere med hovedmaskine på 1400 hk. eller derover hliver tilskuddet henholdsvis 43 øre/kg og 140 øre/kg,

loyvi til feskfiskaveiðu nærri landi enn 12 fjórðingar úr grundlinjunum 19 oyru/kg, tó fyri brosmu, longu, blálongu, upsa, kongafisk og svartkalva 56 oyru/kg um hesi fiskasløg eru veidd á landleiðini,

g. við fiskifari 110 brutto skrásett tons og yvir á feskfiskaveiðu við línu og snellu 170 oyru/kg.

h. við fiskifari undir 110 brutto skrásett tons á línu-, snøris- ella snelluveiðu 19 oyru/kg, tó fyri brosmu, longu, blálongu, upsa, kongafisk og svartkalva 56 oyru/kg um hesi eru veidd á landleiðini,

i. við garnaskipi á feskfiskaveiðu 100 oyru/kg.

j. við trolara á svartkjaftaveiðu ril landingar til matna í Føroyum 38 oyru/kg.

*2. stk.* Til eigara av føroyskum fiskiskipi verður latið 100% av frítíðarlønini, sum hann letur av minstulønini og manningarstudninginum eftir §§ 3 og 5.

f. for fiskefartøj, der har tilladelse til at fiske med trawl efter fersk fisk nærmere land end 12 sømil fra grundlinjerne 19 øre/kg, dog for brosme, lange, blålange, gråsej, rødfisk og hellefisk 56 øre/kg, såfremt disse fiskesorter er fanget på fisketerritoriet,

g. med fiskerfartøj 110 brutto reg. tons og derover på fiskeri efter ferskfisk med line og snelle 170 øre/kg.

h. med fiskerfartøj under 110 brutto reg. tons i fiskeri med line, snøre eller snelle 19 øre/kg, dog for brosme, lange, blålange, gråsej, rødfisk og hellefisk 56 øre/kg, såfremt disse er fanget på fiskeriterritoriet,

i. med garnskib på ferskfiskeri 100 øre/kg.

j. ved trolara á svartkjaftaveiðu til landingar til matna í Føroyum 38 oyru/kg.
kg.

*Stk. 2.* Til ejer af færøsk fiskerfartøj ydes 100% af ferielønnen, denne udbetaler af mindstelønnen og mandskabstilskuddet efter §§ 3 og 5.

**§ 7.** Eisini verður veittur studningur av uppvigaðari vekt í fiskiskapi við trolara við høvuðsmakinu uppá 1400 hk. ella yvir, sum ikki kemur undir fyrisetingarnar í § 6, 1. stk. punkt d.

§ 7. Også ydet tilskud af indvejet vægt til fiskeri med trawler med hovedmaskine 1400 hk. eller derover, som ikke kommer under forudsætningerne i § 6, stk. 1 pkt. d. 40 øre/kg for fiskesor-

40 oyru/kg fyri fiskasløgini hálongu, kongafisk, svartkalva og langasporl.
*2. stk.* Prísískoytið verður at býta millum manning og skip sambært sáttmála millum Føroya Reiðarafelag og viðkomandi yrkisfelag.

terne, blålange, rødfisk, hellefisk og skolæst.
*Stk. 2.* Pristilskuddet deles mellem mandskab og skib i henhold til aftale mellem Føroya Reiðarafelag og vedkommende fagforening.

**Felagsreglur v.m.**

**§ 8.** Studningurin eftir § 5, 1. stk., punktini f., g. og h. og § 6, 1. stk., punktini d., e., f., g. og h. og § 7, 1. stk., verður bert latin fyri rundan fisk og svartkalva, kruvdan, kongafiskur undantikin, við høvdi, sum er blóðgaður og væl reinsaður og avreiddur í Føroyum.

**Fællesbestemmelser m.v.**

**§ 8.** Tilskuddene i henhold til § 5, stk. 1, punkterne f., g. og h. og § 6, stk. 1, punkterne d., e., f., g. og h og § 7, stk. 1 ydes kun for rundfisk og hellefisk, renset, rødfisk undtaget, med hoved, der er strubeskåret og godt renset og indhandlet på Færøerne.

**§ 9.** Hóast skipari ella annar av manningini eftir sáttmála fær meiri enn ein manspart, verður studningurin til hansara bert roknaður av einum mansparti. Er mynstrað fyri minni enn heilan part, fær viðkomandi lut í mun til partin. Í sjálvdráttar veiðu verður býtið at laga seg eftir teimum býtisreglum, sum nýttar eru í hesum veiðuhátti.

**§ 9.** Uanset skipperen eller andre af mandskabet efter aftale får mere end en mandskabsandel, bliver tilskuddet til vedkommende kun at beregne af en mandskabsandel. Er der mønstret for mindre end en hel andel, får vedkommende tilskud i forhold til andelen. Ved enkeltmandsfiskeri retter fordelingen sig efter de fordelingsregler, som anvendes under denne fangstform.

**§ 10.** Henda lóg fær gildi frá 1. apríl 1984, samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 22 frá 18. mars 1980 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna, sum lógin er broytt við løgtings-

**§ 10.** Denne lov har gyldighed fra 1. april 1984. Samtidig træder ud af kraft lagtingslov nr. 22 af 18. marts 1980 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet, således som loven er

lógum nr. 34 frá 20. mai 1981, nr. 35 frá 20. mai 1981, nr. 36 frá 20. mai 1981, nr. 52 frá 9. september 1981, nr. 65 frá 2. oktober 1981, nr. 69 frá 21. mai 1982, nr. 2 frá 6. januar 1983, nr. 56 frá 6. juni 1983 og nr. 57 frá 6. juni 1983.

ændret ved lagtingslovene nr. 34 af 20. maj 1981, nr. 35 af 20. maj 1981, nr. 36 af 20. maj 1981, nr. 52 af 9. september 1981, nr. 65 af 2. oktober 1981, nr. 69 af 21. maj 1982, nr. 2 af 6. januar 1983, nr. 56 af 6. juni 1983 og nr. 57 af 6. juni 1983.

**Viðmerkingar:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Minstaløn | | 13,0 |
| 2. | Minstiforvinningur | | 1,5 |
| 3. | Prísískoyti til saltfisk | | 3,0 |
| 4. | Útróðrarstudningur og landingarstudningur | | 20,0 |
| 5. | Flakastudningur | | 0,3 |
| 6. | Svartkjaftastudningur | | 2,5 |
| 7. | Hemara- og svartkjaftastudningur | | 0,6 |
| 8. | Ídnaðarstudningur | | 7,5 |
| 9. | Brennioljustudningur | | 30,0 |
| 10. | Rakstrarstudningur | | 72,0 |
| 11. | Frítíðarløn | | 1,5 |
| 12. | Fyrisæti | | 2,0 |
| 13. | Rentuútreiðslur | | 0,6 |
| 14. | Grunnur til fígging av fiskiskapsroyndum á fremmandum høvum | | 3,0 |
| 15. | Serligur grunnur til fiskivinnu, mest til at stuðla veiðu, sum ikki hevur verið munandi táttur í samfelagnum higartil, men kann gerast til tað | | 3,0 |
| 16. | Ráfiskagrunnur I | | 60,0 |
| | Ráfiskagrunnur II | svartkjaft | 3,0 |
| | Ráfiskagrunnur III | agn | 8,0 |
| 17. | Prísískoyti til feskan fisk | | 1,0 |
| 18. | Flutningsstudningur | | 0,3 |
| | | | 233,0 |

*Ad 1.:* Minstaløin verður mett at kosta umleið kr. 6,5 mió. meira enn seinasta ár. Henda øking kemur av, at Fiskivinnunevndin hevur samtykt at leggja fyri tingið uppskot um minstuløn til útróðrarmenn. Hetta uppskot verður mett at kosta 6-7 mió. kr. og er hædd tikin fyri kostnaðin í hesum uppskoti. Annars er minstaløin eins og undanfarin ár førd ajour við teimum reguleringum, ið hava verið á arbeiðsmarknaðinum.

*Ad 2.:* Til minstaforvinning eru avsettar kr. 1.500.000,- ímóti kr. 3.000.000,- seinast.

Mettverður, at tá útróðrarmenn nú fara at mynstra um vetrarhálvárið, verður tørvurin minni, og harvið fer fram ein umflytan av nýtsluni frá minstaforvinningi til minstuløn.

*Ad 3.:* Manningarstudningurin til saltfiskatrolarar er tann sami sum í fjør, men orsakað av rakstrarúrslitunum hjá saltfiskabátunum er skotið upp at hækka studningin úr 50 oyrum til 125 oyru/kg. og hevur tí verið neyðugt at seta heldur størri upphædd av til hetta endamál.

*Ad 4.:* Ongin manningarstudningur er broyttur frá undanfarnu áruin. Undantøkini eru studningar til línu- og snelluveiðu við fiskiførum yvir 110 brutto skrásett tons.

Her eru reglurnar gjørdar einfaldari og allir studningarnir lagdir saman í ein og inniber hetta eina hækking, tá hesar manningar eru ringast fyri.

*Ad 5., 6., 7. og 8.:* Her verður mælt til at manningarstudningurin verður tann sami sum í fjør.

*Ad 10.:* Mælt verður til at hækka rakstrarstudningin frá 47,6 mió. kr. til 72 mió. kr. Hetta er mest orsakað av, at rakstrarstudningur til skip í feskfiskaveiðu eftir botnfiski undir Føroyum verður hækkaður munandi.

Eftir upplýsingum frá Fiskivinnuráðnum, sum tingmenn hava fingið kunnleika til, er neyðugt við hesum ískoyti, um flotin ikki skal fara av knóranum.

Á henda hátt verður eisini møguligt at geva eitt íkast til raksturin av skipum, uttan at hetta beinleiðis ávirkar manningarhýrurnar, ið frammanundan eru á hampuligum støði.

*Ad 16.:* Til Ráfiskagrunn I eru avsettar 60 mió. kr. Hesin peningur skal nýtast til at tryggja javnan prís fyri longri tíðarskeið.

Viðvíkjandi fiskiførum undir 110 brutto skrásett tons, ið eru á línu- ella snelluveiðu undir Føroyum, skal avreiðingarprísurin á ongum sinni verða minni enn ájavnt við avroknungarprísin. Við hesi broyting metir landsstýrið, at grundarlagið undir ymiskari prísáseting millum ymiskar veiðuhættir er avhjálpt og er í uppskotinum tikin hædd fyri línuskipum yvir 110 brutto skrásett tons undir §§ 5 og 6 hesum viðvíkjandi.

Viðvíkjandi Ráfiskagrunni II og III eru upphæddirnar settar út frá fingrum upplýsingum og liggur játtanin á sama støði sum í fjør.

*Ad 17.:* Her er talan um lækking orsakað av, at í § 7 í stuðulslógini er tikin út eykastuðul uppá 4 oyru/kg til fiskiskip yvir 110 tons og er hesin studningur farin til §§ 5 og 6.

1. viðgerð 26. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 7. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 11. apríl 1984 og undir 1. viðgerð tann 26. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Í fyriliggjandi føri hevur landsstýrið sett fram uppskot um ávísar broytingar í galdandi skipan, sett í karm, soleiðis at allar galdandi reglur hesum viðvíkjandi eru í eini og somu lóg. Í viðmerkingunum verður sagt frá, at samlaða stuðulsveitingin til fiskivinnuna eftir fíggjarløgtingslógini 1984/85 er 233 mió. kr. Viðmerkingar eru gjørdar frá landsstýrinum til ávísar tættir í uppskotinum.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og havt fund við Anfinn Kallsberg, landsstýrismann, og umboð fyri Føroya Fiskimannafelag.

Undir viðgerðini hevur fíggjarnevndin heft seg við, at orsøk er til at gera ávísar broytingar, og er júst talan um § 4, 1. stk., har spurningurin um stuðul fyri snelluveiddan fisk aftur varð tikin fram.

Viðvíkjandi manningarstudninginum er fíggjarnevndin av teirri áskoðan, at tað er orsøk til at broyta nakrar av oyraupphæddunum, ið skotnar upp eru.

Í § 6 viðvíkjandi rakstrarstudningi er ein skrivivilla, sum verður rættað í broytingaruppskotinum frá meirilutanum. Viðvíkjandi rakst-

rarstudninginum eru eisini ávísar upphæddir, sum fíggjarnevndin metir, eiga at verða broyttar.

Til § 7 í uppskotinum er at viðmerkja, at fíggjarnevndin er komin til ta niðurstøðu, at tað er ikki beint, at dentur verður lagdur á spurningin um, hvørja stødd høvuðsmaskina á trolara hevur í hesum viðfangi.

Í viðmerkingum landsstýrisins til lógaruppskotið á síðu 13, ad pkt. 16, sigur landsstýrið, at viðvíkjandi fiskiførum undir 110 brt. skrásett tons, ið eru á línu- ella snelluveiðu undir Føroyum, skal avreiðingarprísurin á ongum sinni verða minni enn ájavnt við avrokningarprísin. Landsstýrið undirstrikar, at við hesi broyting metir tað grundarlagið undir ymiskari prísáseting í millum ymiskar veiðihættir er avhjálpt, at í uppskotinum er tikin hædd fyri skipum yvir 110 brutto skrásett tons undir §§ 5 og 6 hesum viðvíkjandi.

Fíggjarnevndin hevur undir viðgerðini havt tað úttalilsi sum grundarlag fyri støðutøku sína sum eina fortreyt fyri undirtøku til uppskot landsstýrisins; serliga í týdninginum av at eins prísir verður fyri eins góðsku, og at prísurin verður tann sami, líka mikið veiðuhátt. Við øðrum orðum, at álitið her er grundað á, at talan ikki kann verða um annað enn ein prís, og ikki tveir prísir.

Fíggjarnevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) setir sostatt fram soljóðandi

**broytingaruppskot**

**til uppskot landsstýrisins**

| | |
|---|---|
| 1) Í § 4 verður skoytt upp í stk. 1, 1. punktum: »tó tá talan er um snelluveiddan fisk, bert hálvur minstiforvinningur.« | 1) I § 4, til stk. 1, 1. punktum tilføjes: »dog når der er talen om fisk, der er fanget med snelle, kun halv mindsteforvinding.« |
| 2) § 5, pkt. f verður orðað soleiðis: »Á deksfiskifari upp til 110 br. skrásett tons við línu ella snellu á feskfiskaveiðu | 2) § 5, pkt. f formuleres således: »På dæksfiskerfartøj op til 110 br. reg. tons med line eller snelle efter frisk fisk 60 |

60 oyru/kg, tó fyri upsa, brosmu, longu og blálongu 70 oyru/kg.«

3) § 5, pkt. g verður orðað soleiðis:
»Á línu- og snelluskipum yvir 110 brutto skrásett tons 130 oyru/kg.«

4) § 6, pkt. d verður orðað soleiðis:
»Við trolara, sum hevur ella kann fáa veiðuloyvi uttan fyri landleiðina til saltfiska-, frysti- ella ísfiskaveiðu, á feskfiskaveiði á landleiðini, útlendskum ella altjóða sjógvi 8 oyru/kg, tó fyri brosmu/longu, blálongu, upsa, kongafisk og svartkalva 47 oyru/kg, um hesi fiskasløg eru veidd á landleiðini.«

5) Í § 6, pkt. 1: »133 oyru/kg« verður broytt til »123 oyru/kg« og »140 oyru/kg« verður broytt til »130 oyru/kg«.

6) Í § 6, pkt. g »170 oyru/kg« verður broytt til »150 oyru/kg«.

7) Í § 6, pkt. i »100 oyru/kg« verður broytt til »80 oyru/kg«.

8) § 7, 1. stk. verður orðað soleiðis:

øre/kg, dog for gråsej, brosme, lange og blålange 70 øre/kg.«

3) § 5, pkt. g formuleres således:
»På line- og snelleskibe over 110 brutto register tons 130 øre/kg.«

4) § 6, pkt. d formuleres således:
»Med trawler, som har eller kan opnå fiskeritilladelse udenfor fiskeriterritoriet til fiskeri efter saltfisk, frossen fisk eller isfisk, på fiskeriterritoriet, udenlandsk eller internationalt søterritorium 8 øre/kg, dog for brosme, lange og blålange, gråsej, rødfisk og hellefisk 47 øre/kg, såfremt disse fiskearter er fisket på fisketerritoriet.«

5) § 6, pkt. 1: »133 øre/kg« ændres til »123 øre/kg« og »140 øre/kg« ændres til »130 øre/kg«.

6) I § 6, pkt. g »170 øre/kg« ændres til »150 øre/kg«.

7) I § 6, pkt. i »100 øre/kg« ændres til »80 øre/kg«.

8) § 7, stk. 1 formuleres således:

»Studningur av uppvigaðari vekt í fiskiskapi við trolara, sum ikki kemur undir fyrisetningarnar í § 6, 1. stk., pkt. d, 40 oyru/kg fyri fiskasløgini blálongu, kongafisk, svartkalva og langasporl.«

»Også ydes tilskud af indvejet vægt til fiskeri med trawler, som ikke kommer under foresætningerne under § 6, stk. 1, pkt. d, 40 øre/kg for fiskesorterne blålange, rødfisk, hellefisk og skolæst.«

Minnilutin (Ove Mikkelsen) umboðandi Tjóðveldisflokkin hevur til tingmálið nr. 133/1983: Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna hesar viðmerkingar.

Uppskotið til Ráfiskagrunn gjørdi tjóðveldisflokkurin, tá hann sat í stjórn, men gekk partur av samgonguni ikki við til at leggja uppskotið fram í tess upprunaliga líki, og varð úrslitið, at eitt lógaruppskot um ráfiskagrunn, hvørs mál og ætlan lítið og einki hevði til felags við upprunaliga uppskot tjóðveldisfloksins.

Hesum mótmælti Tjóðveldisflokkurin og gjørdi vart við, hvussu gongdin fór at verða við Ráfiskagrunninum framyvir. Hann royndi bæði, tá hann sat í stjórn, og nú í andstøðu at fáa hesa skeivu gongd í stuðulsskipanini við fylgjandi órættvísi móti ávísum veiðiháttum broytta, men tó alt til fánýtis.

Tað má verða øllum greitt, at tað almenna fullkomiliga hevur mist tamarhaldið á stuðulsskipanini, og tað einasta, sum gjørt hevur verið í hesum sambandi frá almennari síðu, er, at lagt hevur verið nøkur oyru her og nakrar krónur har oman á galdandi studning.

Úrslitið kenna vit eisini. M.a. at í fjør, tá fiskiveiðan setti met í veiðunøgd, var tað eisini neyðugt at tøma tiltaksgrunnin til ráfiskagrunn, bert fyri at svara studningsgjøldini eftir galdandi reglum, og hóast tað, at tiltaksgrunnurin varð ætlaður til heilt annað endamál.

Orsøkirnar til, at studningsskipanin til fiskivinnuna í dag kostar okkum ein fjórðing av samlaðu fíggjarlóg, er heldur ikki ókendar. Orsøkirnar eru nógvar — eisini grundleggjandi og mentalar. Tjóðveldisflokkurin hevur tí ferð eftir ferð lagt uppskot fram á ting, sum hava ávíst skeivleikarnar í førda politikki innan hetta økið. Uppskot, sum hava miðað í móti at fáa fiskivinnuna — bæði á sjógvi og á landi — til mest gjørligt at hvíla í sær sjálvum.

Men øll hesi uppskot til gongdar leiðir hava tíverri onga undirtøku fingið.

Úrslitið av samgongunnar mál- og miðloysi, tørvandi planlegging og vilja til at gera nakað, er so tað, at skattaborgarin nú skal gjalda eina kvart milliard fyri at halda hjólini gangandi. Hóast hesa stóru stuðulsupphædd, so er tað hent, at okkara útróðrarfloti sum heild er komin á gravarbakkan vegna tørvandi lønsemi. Alt tað, sum eitur heimaútróðrur, er tí við at doyggja út.

Minnilutin setir tí fram fylgjandi

**uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at áleggja landsstýrinum at gera uppskot um, hvussu fiskivinna okkara sum heild — frá veiðu til sølu — fíggjarliga mest møguliga kemur at hvíla í sær sjálvum, hvussu býtið veiðihættanna millum skal verða samansettur, hvussu virkini fáa sum mest burturúr, og hvussu fiskasølumál best verða røkt.

Álitið verður at leggja fyri tingið fyrst í komandi ólavsøkutingsetu.

Í fjør vístu hagtølini, at alt sum eitur trolari — 62 í tali — og stállínuskip — 19 í tali — hevði eitt rakstraravlop upp á 47 mió. kr., meðan útróðrarbátar — 139 í tali — høvdu eitt rakstrarhall upp á 19 mió. kr.

Tað løgna er, at eftir fyriliggjandi uppskotum landsstýrisins skulu nevndu trolarar og stállínubátar nú fáa ein eykastudning upp á 24,5 mió. Taparin — útróðrarflótin skal framvegis verða fyri vanbýti og fær onga hækkan. Hetta býti metir tjóðveldisflokkurin, at vera burturvið skeivt og fastheldur, at størsti partur av hesum eyka studningi upp á 24,5 mió. kr. heldur átti at komið tí partinum av flotanum, sum er ringast fyri fíggjarliga, til góðar, nevniliga útróðrarflotanum til manningar- og rakstrarstudning til vanligar útróðrarbátar yvir 10 br. reg. t.

Ásannandi, at ikki verður rokkið á mál beinan vegin við at fáa fiskivinnuna at hvíla í sær sjálvum, noyðast vit at halda fram við studningsskipan, og setir flokkurin tí, fyri hesi broytingaruppskot fyri at bøta um ringastu vanbýtini í uppskotum landsstýrisins

**broytingaruppskot**

1) § 5, f verður orðað soleiðis: »á deksfiskiførum upp til 110 brt. skrásett tons við línu, snellu, gørnum og troli á feskfiskaveiðu 70 oyru/kg, tó fyri brosmu, longu og upsa 120 oyru/kg.«
2) § 5, pkt. j, verður orðað soleiðis: »Opnir bátar fáa studning upp á 70 oyru/kg og eykastudning upp á 9 oyru/kg, tá teir hava bensinmotor.«
3) Í § 6, pkt. f, verða »19 oyru /kg« broytt til »50 oyru/kg« og »56 oyru/kg« broytt til: »170 oyru/kg«.
4) Í § 6, pkt. h, verður »19 oyru /kg« broytt til »70 oyru/kg« og »56 oyru/kg« broytt til »170 oyru/kg«.

1) § 5, f formuleres således: »på dæksfiskerfartøj op til 110 brutto reg. tons med line eller snelle, garn og trawl efter frisk fisk 70 øre/kg, dog for brosme lange og gråsej 120 øre/kg.«
2) § 5, pkt. j, formuleres således: »Åbne både får tilskud på 70 øre/kg og ekstratilskud på 9 øre/kg, når de har benzinmotor.«
3) I § 6, pkt. f, ændres »19 øre/kg« til »50 øre/kg« og »56 øre/kg« til »170 øre/kg«.
4) I § 6, pkt. h ændres »19 øre/kg« til »70 øre/kg« og »56 øre/kg« til »170 øre/kg.

5) Ad 16. Í viðmerkingunum verður orðingin broytt til at umfata trolveiðu eisini soleiðis: »Línu, snellu, gørnum ella trolveiðu«.

Minnilutin (Atli Dam) førir fram:

Fyriliggjandi landsstýrisuppskot sýnir, at samgongan heldur ikki á fiskivinnuøkinum átti nakran alternativan politikk. Fyri hálvumfjorða ári síðani segði samgongan:

»Studningsskipanin til fiskivinnuna og lógir um Ráfiskagrunnin skulu enduskipast og gerast einfaldari. Sum liður í hesum verður umhugsað, um stuðulin kann leggjast í annað lið. Endamálið við allari skipanini er at halda samfelagshjólini gangandi, til vinnan ber seg uttan stuðul. Miðað verður ímóti við stuðulslóggávuni, at flest øll skip verða bygd í Føroyum.«

Einki av hesum er gjørt, og sum tíðin leið, fóru samgongumenn at lata hvønn annan úr og hvør sær geva samgongupartnarum skuldina fyri, at naggatódn er í øllum fiskivinnupolitikkinum.

Løgmaður segði herfyri, at orsøkin var, at hann ikki maktaði at fáa síni broytingaruppskot ígjøgnum í samgonguni. Fyrispurningur í tinginum avdúkaði, at hetta er ósatt. Tað er eyðsæð, at løgmaður eingi ítøkilig uppskot hevur framborið — lcyst tos møguliga, men eingi uppskot.

Einasta broytingin hesi fýra árini viðvíkur samansetingini av nevndini í Ráfiskagrunninum, sum varð broytt soleiðis, at fiskimálaráðharrin betri kann fremja síni persónligu sjónarmið viðvíkjandi einstøkum veiðihættum og skipabólkum.

Politikkurin hevur tí bert verið »lapparír«, sum hava gjørt tað møguligt hjá borgarliga stýrinum at røkja umfordeilingspolitikkin enn meira til fyrimuns fyri ávísan samfelagsbólk, sum meira og meira gerst uppisitari hins almenna, uttan at hesin livir upp til ábyrgdina, sum skuldi fylgt avgerðarrættinum.

Allir búskaparkønir meta, at slík stuðulsskipan sum okkara kann gerast skaðilig, verður hon ein av teim givnu og óbroytiligu grundarsteininum, sum rakstur vinnunnar og íløgurnar byggja á. Kortini megnar samgongan ikki at fremja slíkar broytingar, at elvt verður til rationalisering, effektivisering og rentabilitet.

Fyriliggjandi uppskot er eisini bert »lapparí«, men hesa ferð nógv meira óavvegað sosialt enn áður. Tað er stórt sæð reiðarasíðan, sum við munandi øktum stuðli fær endurgjald fyri eitt væntað prísfall í longri tíð og eina metta minni veiðinøgd.

Eitt av málum samgongunnar var, at stuðulin í krónum skuldi verður óbroytt — 203 mill. kr. árliga — soleiðis at hann minkaði lutfallsliga sum partur av samlaður fíggjarlógini.

Eisini hetta endaði sum »prár«. Nýtslan seinasta fíggjarár man nærkast 300 mill. kr., tá brúkið úr »katastrofugrunninum« er talt við.

Metingarnar í ár byggja eisini á heilt óverunligar fortreytir og koma sostatt ikki at halda. Við hesum fortreytum røkka 230 mill. kr. als ikki, men hetta ørkymlar ikki sitandi samgongu, sum her eins og í øllum førum skúgvar spurningarnar undan sær — út um valið hugsandi »Efter os syndfloden«.

Tað vildi verið fáfongt av minnilutanum at vænta, at ítøkilig broytingaruppskot kunnu vinna frama, hvussu rættvís og sjálvsøgd tey enn eru. Hesum forðar § 13, sum hevur sett demokratiið í »karantenu« til eftir valið, fyri.

Vísandi til, at einki vinnufelag hevur kunnað tikið undir við uppskoti samgongunnar, men at tey tvørturímóti øll hava víst á sosiala

órættvísi í uppskotum hennara, skal minnilutin kortini minna á, at er ætlanin at eggja til umlegging av veiðuni, nyttar lítið, at bert annar parturin fær endurgjald. Manningarnar munnu hava sína ávirkan á, hvat veitt verður og hvar veitt verður.

Skotið verður tí upp, at har als einki, ella nærum einki, er latið, verður gjørd tann — um ikki annað so »symbolska« broytingin, at § 5 fær hesar broytingar, og setir fram soljóðandi

**broytingaruppskot**

Í § 5 í uppskoti landsstýrisins verða gjørdar hesar broytingar:

a. Á trolara í saltfiskaveiðu 50 oyru/kg saltfisk.
f. á deksfari upp til 110 brutto skrásett tons við línu ella snellu á feskfiskaveiðu 60 oyru/kg, tó fyri upsa, brosmu, longu og blálongu 90 oyru/kg.
h. á trolara á feskfiskaveiðu 15 oyru/kg.
i. við gørnum á feskfiskaveiðu 40 oyrú/kg.

I § 5 i landsstyrets forslag foretages følgende ændringer:

a. På trawler i fiskeri efter saltfisk 50 øre/kg saltfisk.
f. på dæksfiskerfartøj op til 110 brutto reg. tons med line eller snelle efter frisk fisk 60 øre/kg, dog for brosme og lange 90 øre/kg.
h. på trawler på fersk fiskeri 15 øre/kg,
i. med garn på ferskfiskeri 30 øre/kg.

Nevndu uppskot eru eingin roynd at gera rætt og skjal ella at fylgja tilnælum vinnufelaganna, men tey eru løgd, so nær uppskotum meirlutans, at einhvør limur í samgonguni við minstu rættvísiskenslu í sær kann atkvøða fyri uttan at kenna, at hann harvið sprengir tvungna »solidariteten« í samgonguni.

Minnilutin (Juul Jacobsen) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 8. mai. Broytingaruppskot frá Atla Dam til pkt. 5 h fall við 13-0, pkt. 5 a, f, i fulla við 15-0. Broytingaruppskot frá Ova Mikkelsen fall við 15-0 og pkt. 5 í viðmerkingunum fall við 15-0. Broytingaruppskot frá meirluta í nevndini til pkt. 1 samtykt við 17-0, pkt. 2-8 samtykt við 32-0. Uppskot landsstýrisins § 1 samtykt við 29-0, §§ 2-9 við 31-0, § 10 við 32-0. At fara til 3. viðgerð soleiðis samtykt við 32-0. Uppskotið til samtyktar fall við 8-0.

8. mai løgdu Ivan Johannesen, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen fra soljóðandi

**Broytingaruppskot**

*1.* Í § 5, pkt. f, tann undir 2. viðgerð samtykta upphædd »60 oyru/kg« verður broytt til »50 oyru/kg« og »70 oyru kg« verður broytt til »125 oyru/kg«.

*1.* I § 5, pkt. f, ændres det under 2. behandling bevilgede beløb »60 øre/kg« til »50 øre/kg« og »70 øre/kg« til: »125 øre/kg«.

*2.* Í § 6, pkt. f, tey undir 2. viðgerð samtyktu »56 oyru/kg« verða broytt til »106 oyru/kg«.

*2.* I § 6, pkt. f, ændres det under 2. behandling bevilgede beløb »56 øre/kg« til: »106 øre/kg«.

*3.* Í § 6, pkt. h, tey undir 2. viðgerð samtyktu »56 oyru/kg« verða broytt til »106 oyru/kg«, og orðini »um hesi eru veidd á landleiðini« ganga út.

*3.* I § 6, pkt. h ændres det under 2. behandling bevilgede beløb »56 øre/kg« til: »106 øre/kg«, og ordene »såfremt disse er fanget på fiskeriterritoriet« udgår.

9. mai løgdu tingmenninir Atli Dam, Adolf Hansen og Ove Mikkelsen fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

Í § 5, pkt. h, verða »5 oyru/kg« broytt til »8 oyru/kg« og verður skoytt uppí: »tó fyri fiskasløgini brosmu, longu, blálongu, kongafisk og svartkalva 12 oyru /kg.«

I § 5, pkt. h, ændres »5 øre/kg« til »8 øre/kg« og tilføjes: »dog for fiskesorterne brosme, lange, blålange, rødfisk og hellefisk 12 øre/kg«.

2. viðgerð 8. mai. Broytingaruppskot frá Atla Dam, pkt. 5 h fall við 13-0, pkt. 5 a., f. og i fullu við 15-0. Broytingaruppskot frá Ova Mikkelsen fall við 15-0 og pkt. 5 í viðmerkingunum fall við 15-0.

Broytingaruppskot frá meiriluta í nevndini, pkt. 1 samtykt við 17-0, pkt. 2-8 samtykt við 32-0. Lógaruppskotið § 1 samtykt við 29-0, §§ 2-9 samtyktar við 31-0, § 10 samtykt við 32-0. Soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð samtykt við 32-0. Uppskot til samtyktar fall við 8-0.

3. viðgerð 9. mai. Broytingaruppskot frá Atla Dam, Adolf Hansen og Ova Mikkelsen fall við 15-0. Broytingaruppskot frá Ivan Johannesen, Øssi Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen, pkt. 1 samtykt við 30-0, pkt. 2 fall við 16-0, pkt. 3 fall við 16-0. Uppskotið soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð við broytingum til § 4, 5, pkt. f endaliga samtykt við 31-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1539-2-1. Lóg nr. 48 frá 28. mai 1984.

---

# 134. Løgtingslóg um tíðaravmarkaðan eykastuðul til fiskivinnuna.

Ár 1984, týsdagin 11. apríl legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um tíðaravmarkaðan eykastuðul til fiskivinnuna.**

§ 1. Í eykastudningi verður latið til manningina á føroyskum fiski-

**lagtingslov om tidsbegrænset tilskud til fiskerierhvervet.**

§ 1. I ekstratilskud ydes til mandskabet på færøsk fiskefartøj 13,5

fari 13,5 oyru/kg. Til fiskifar verður latið í eykastudningi 31 oyru/kg. Studningurin verður latin fyri rundan fisk, svartkalva, kruvdan, kongafiskur undantikin, við høvdi, sum er blóðgaður og væl reinsaður og avreiddur í Føroyum. Hóast skiparin ella annar av manningini eftir sáttmála fær meiri enn manspart, verður studningur til hansara bert roknaður av einum parti.

§ 2. Henda lóg fær gildi frá 1. februar til 31. mars 1984.

øre/kg. Til fiskefartøj ydes i ekstratilskud 31 øre/kg. Tilskudet ydes for rund fisk, hellefisk, renset, rødfisk undtaget, med hoved, der er strubeskåret og godt renset og indhandlet på Færøerne. Uanset at skipperen eller andre af mandskabet efter overenskomst får mere end en mandskabsandel, bliver tilskuddet til vedkommende kun at beregne af en mandskabsandel.

§ 2. Denne lov træder i kraft den 1. februar og træder ud af kraft den 31. marts 1984.

**Viðmerkinghar:**
Vinnan hevur um ársskiftið vent sær til landsstýrið, av tí at prísurin var fallin, við umbøn um at játta meiri pening til Ráfiskagrunnin, so prísurin kundi haldast á einum støði, sum lá um 50 oyru/kg hægri enn táverandi prísur.

Landsstýrið heldur eina hækking vera neyðuga, men mælir í staðin til at veita henda stuðul sum manningar- og rakstrarstudning í staðin og avmarkað fyri tíðarskeiðið 1. februar til 31. mars 1984. Kostnaðurin fyri henda eykastudning verður mettur til umleið 10 mió. kr. Upphæddin verður at seta á eykafíggjarlóg 1983/84.

1. viðgerð 26. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 12. apríl 1984 og undir 1. viðgerð tann 26. apríl beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í 4 minnilutar.

Minnilutin (Ivan Johannesen, Sv. Åge Ellefsen og Jógvan Sundstein) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein annar minniluti (Atli P. Dam og Adolf V. Hansen) mælir til at umfrant uppskotna manningastudningin uppá 13,5 oyru/kg verður latið á línuveiðu 22,5 oyru/kg og setir fram soljóðandi

**broytingaruppskot**

§ 1, 1. punktum verður orðað soleiðis:
»Í eykastudningi verður latið til manningina á føroyskum fiskifari 13,5 oyru/kg, á línuveiðu 22,5 oyru/kg.«

§ 1, 1. punktum affattes således:
»I ekstratilskud ydes til mandskabet på færøsk fiskerfartøj 13,5 øre/kg, på linefiskeri 22,5 øre/kg.«

Ein triðji minniluti (Ove Mikkelsen) tekur støðu í tingsalinum.

Fjórði minnilutin (Hilmar Kass) førir fram:

Í árinum 1983 varð so nógv fiskað við Føroyar sum ongantíð fyrr og fíggjarliga úrslitið hjá trolveiðuflotanum var sera gott, meðan tað ikki var so gott fyri línuveiðuna.

Úrslitið av hesi stóru veiðu var, at stuðulsveitingarnar til fiskivinnuna vóru nógv størri enn tað, ið var á fíggjarlógini.

Í fíggjarárinum 1983/84 eru latnar úr Ráfiskagrunninum einar 30 mió. kr. meira enn tað, ið var á fíggjarlógini.

Í uppskoti landsstýrisins verður skotið upp at játta umleið 10 mió. kr. aftrat fyri nevndu ovurnýtslu úr grunninum í fíggjarárinum 1983/84.

Tað verður ikki gjørdur munur á trol- og línuveiðu og úrslitið verður sostatt at trolveiðan fær størsta partin av hesi eykajáttan, tí trolararnir veiddu størru nøgdirnar.

Í uppskoti landsstýrisins um stuðulsveiting til fiskivinnuna í fíggjarárinum 1984/85 eru játtanirnar munandi hækkaðar.

Minnilutin tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins.

9. mai løgdu tingmenninir Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen fram soljóðandi:

**Broytingaruppskot**

§ 1 verður orðað soleiðis:

»Í eykastudningi verður latið

§ 1 formuleres således:

»I ekstratilskud ydes mand-

til manningina við føroyskum fiskifari á trolveiðu 13,5 oyru /kg, á línu, snellu- og garnaveiðu 22,5 oyru/kg. Til fiskifar verður latið í eykastudningi 31 oyru/kg á línu-, snellu- og garnaveiðu 22,5 oyru/kg.«

skabet på færøske fiskefartøjer på trawlfiskeri 13,5 øre/kg, på line-, snelle- og garnfiskeri 22,5 øre/kg. Til fiskerfartøjet ydes i ekstratilskud 31 øre/kg på line-, snelle- og garnfiskeri 22,5 øre/kg.«

2. viðgerð 8. mai. §§ 1 og 2 vórðu samtyktar við 28-0 atkvøðum. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 29-0 atkvøðum. Broytingaruppskotið frá minnilutanum (Atla Dam og Adolf Hansen) fall við 15-0 atkvøðum.

3. viðgerð 9. mai. Málið endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1539-2-I. Lóg nr. 55 frá 5. juni 1984.

---

# 135. Broyting í løgtingslóg um tænastumannalønir v.m.

Ár 1984, týsdagin 11. apríl legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Løgtingstíðindi 1983 A 84

# Uppskot

## til

## løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tænastumannalønir v.m.

§ 1. Í løgtingslóg nr. 37 frá 5. august 1971 um tænastumannalønir v.m. og flokking av tænastumannastørvum, sum broytt við løgtingslóg nr. 20 frá 1. mai 1973, verða í § 7 gjørdar hesar broytingar:

1. Undir nr. 1,
   Landsskrivstovan verður
   »Stjóri ..... 1«
   broytt til:
   »Stjóri ..... 2«
2. Undir nr. 4,
   Gjaldstovan verður
   »Deildarleiðari ..... 5«
   broytt til:
   »Deildarleiðari ..... 6«
3. Undir nr. 5,
   Tolleftirlitið verður
   »Tollari ..... 6«
   broytt til:
   »Tollari ..... 11«
4. Undir nr. 8,
   Sjómansskúlin verður
   »Lærari ..... 5«
   broytt til:
   »Lærari ..... 10«
5. Sum uppískoyti til § 7 verður sett:

## lagtingslov om ændring af lagtingslov om tjenestemandslønninger m.v.

§ 1. I lagtingslov nr. 37 af 5. august 1971 om tjenestemandslønninger m.v. og om klassificering af tjenestemænd, som ændret ved lagtingslov nr. 20 af 1. maj 1973 foretages følgende ændringer i § 7:

1. Under nr. 1,
   Landsskrivstovan ændres
   »Kontorchef ..... 1«
   til:
   »Kontorchef ..... 2«
2. Under nr. 4,
   Oppebørselskontoret ændres:
   »Afdelingsleder ..... 5«
   til:
   »Afdelingsleder ..... 6«
3. Under nr. 5,
   Toldvæsenet ændres:
   »Tolder ..... 6«
   til:
   »Tolder ..... 11«
4. Under nr. 8,
   Sømandsskolen ændres:
   »Lærer ..... 5«
   til:
   »Lærer ..... 10«
5. Som tilføjelse til § 7 sættes:

| | Normering<br>Normering | Lønarramma<br>Lønramme |
|---|---|---|
| 16. Landsskúlafyrisitingin<br>Undervisningsdirektorat<br>Landsskúlastjóri<br>Undervisningsdirektør ..... | 1 | 37 |
| 17. Útvarp Føroya<br>Færøernes Radio<br>Stjóri/Direktør ..... | 1 | 36 |
| 18. Grannskoðaradeild Landskassans<br>Landskassens revisionsafdeling<br>Stjóri/Direktør ..... | 1 | 35 |
| 19. Almannastovan/Almannastovan<br>Stjóri/Direktør ..... | 1 | 36 |
| 20. Eysturoyar Studentaskúli og HF-skeið<br>Gymnasiet og HF-kursет på Eysturoy<br>Rektari/Rektor ..... | 1 | 37 |

**Viðmerkingar:**

Ongar reglar finnast sum avmarka, hvørji størv eiga at skipast sum tænastumannastørv. Principielt eiga størv, har viðkomandi eigur at kunna virka óheftur av politisku myndugleikunum og størv, sum eru lívsneyðug, ella sum tað er umráðandi fyri samfelagið at hava gangandi undir arbeiðssteðgi at vera tænastumannastørv.

Síðani tænastumannalógin varð broytt í 1971 eru bert 3 nýggj tænastumannastørv normerað (á Sjómansskúla Føroya).

Hin vegin eru fleiri nýggj størv játtað, og eru fólk sett í størvini, lønt eftir lønarrammu í tænastumannalønarlógini. Nøkur eru sett upp á tænastumannatreytir uttan at vera tænastumenn, t.v.s. m.a. við eftirlønarrætti. Hesi eru annar stjórin á landsskrivstovuni, landsskúlastjórin og rektarin á Eysturoyar Studentaskúla- og HF-skeið. Onnur eru lønt eftir ávísum lønarrammum í tænastumannalønarlógini uttan harvið at vera sett upp á tænastumannatreytir. Herundir koma 5 lærarar á Sjómansskúlanum og 5 tollarar (1 í Runavík, 1 í Fuglafirði, 1 í Tórshavn (narkotikahundaførarin) og 2 í Vágum, harav annar arbeiðir í hálvdagsstarvi sum tryggdareftirlit undir toll-eftirlitinum og í hálvdagsstarvi sum vanligur tollari). Øll hesi verða sambært uppskotið lønt sambært somu lønarrammu sum áður.

Undir nr. 2 verður eitt deildarleiðarastarv normerað afturat í Gjaldstovuni. Øll 6 størvini eru í dag lønt sambært sáttmála í millum

Landsstýrið og Starvsmannafelagið, og verður sostatt ikki talan um at økja um samlaða talið av normeringum á Gjaldstovuni.

Stjóri á Útvarp Føroya og leiðarin fyri Grannskoðaradeildini eru í dag løntir sambært sáttmála við Starvsmannafelagið. Felagið hevur mælt til at gera útvarpsstjórastarvið til tænastumannastarv.

Stjórin á almannastovuni er í dag løntur sambært sáttmála ímillum statin og Dansk Jurist og Økonomforbund. Harafturat fær hann eina leiðaraviðbót.

1. viðgerð 26. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 8. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið var lagt fram av landsstýrinum 12. apríl 1984 og undir 1. viðgerð 26. í s.m. beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og tekur ein meiriluti (Ivan Johannesen, Svend Age Ellefsen, Asbjørn Joensen, Øssur Dam Jacobsen, Ove Mikkelsen, Atli P. Dam) undir við uppskoti landsstýrisins, tó at viðvíkjandi § 1, pkt. 18: Grannskoðaradeild Landskassans, har lønarramman er skotin upp at verða 36, mælir nevndin til, at lønarramman verður 33.

Í uppskoti landsstýrisins er eingin grein um, nær lógin skal koma í gildi.

Samsvarandi hesum setir ein meiriluti til uppskot landsstýrisins fram soljóðandi

**broytingaruppskot**

1) Í § 1, pkt. 18: Grannskoðaradeild Landskassans verður lønarramma »36« broytt til: »35«.
2) Sum § 2 verður sett:
»§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.«

1) I § 1, pkt. 18: Landskassens revisionsafdeling ændres løniramme »36« til: »35«.
2) Som § 2 indsættes:
»§ 2. Denne lov træder i kraft straks.«

Undir viðgerðini av løgtingsmáli nr. 135/1983: Broyting í løgtingslóg um tænastumannalønir v.m. hevur fíggjarnevndin havt til umbøtt spurningin um samsýning landsstýrismanna.

Meirilutin er av tí áskoðan, at løgmaður eigur at vera hægsti lønti persónur í almennari tænastu, og at landsstýrismenn eiga at verða settir í lønarramu 38. Somuleiðis er fíggjarnevndin samd um, at talvan í § 2, 1. stk. í løgtingslóg um samsýning landsstýrismanna eigur at verða broytt soleiðis, at orðingin í stk. 2 í nevndu grein: »frá 0-2 ár« verður broytt til »frá 0-1 ár«, »frá 1-3 ár« o.s.fr.

Samsvarandi hesum setir meirilutin fram soljóðandi lógaruppskot um broyting í løgtingslóg nr. 39 frá 5. august 1971 um samsýning landsstýrismanna:

**§ 1.** Í § 1 í løgtingslóg nr. 39 frá 5. august 1971 um samsýning landsstýrismanna verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, 1. punktum verður orðað soleiðis:
»Løgmaður verður samsýntur eftir § 2, 40. lønarrammu í løgtingslóg nr. 37 frá 5. august 1971 um tænastumannalønir v.m. og flokking av tænastumannastørvum, og hinir landsstýrismenninir eftir 38. lønarrammu í somu lóg.«

2) Talvan í § 2, 1. stk. verður broytt soleiðis:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| »Frá | 0-1 ár | 8.000 | kr. | árliga |
| - | 1-3 - | 12.500 | - | - |
| - | 3-5 - | 17.000 | - | - |
| - | 5-7 - | 21.500 | - | - |
| yvir | 8 ár | 26.000 | - | - |

**§ 2.** Henda lóg fær gildi 1. aprfl 1984.

**§ 1.** I § 1 i lagtingslov nr. 39 af 5. august 1971 om vederlag til landsstyresmænd foretages følgende ændringer:

1) § 1, 1. punktum formuleres som følger:
»Lagmanden vederlægges i henhold til § 2, 40. lønramme i lagtingslov nr. 37 af 5. august 1971 om tjenestemandslønninger m.v. og de andre landsstyresmænd i henhold til 38. lønramme i samme lov.«

2) Tavlen i § 2, stk. 1 ændres således:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| »Fra | 0-1 år | 8.000 | kr. | årlig |
| - | 1-3 - | 12.500 | - | - |
| - | 3-5 - | 17.000 | - | - |
| - | 5-7 .. | 21.500 | - | - |
| over | 8 år | 26.000 | - | - |

**§ 2.** Denne lov træder i kraft 1. april 1984.

Undir viðgerðini er spurningurin um bíðipening hjá løgtingsmonnum sambært § 2 í løgtingslóg nr. 38 frá 5. august 1971 um samsýning løgtingsmanna viðgjørdur.

Viðvíkjandi hesum spurningi hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Atli P. Dam, Ove Mikkelsen, Sv. Åge Ellefsen, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen) er av teirri áskoðan, at tað er ikki beint, at løgtingsmaður, ið verður landsstýrismaður, missir rættin til bíðipening eftir § 2 í nevndu lóg.

Minnilutin (Adolf Hansen) er ikki samdur í hesi áskoðan.

Nevndi meiriluti setir sostatt fram soljóðandi

**uppskot**

**til**

| | |
|---|---|
| **løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 38 frá 5. august 1971 um samsýning løgtingsmanna.** | **lagtingslov om ændring i lagtingslov nr. 38 af 5. august 1971 om vederlag til lagtingsmænd.** |
| § 1. Í løgtingslóg nr. 38 frá 5. áügust 1971 um samsýning løgtingsmanna § 2 verður orðingin broytt soleiðis at orðini: »og ikki ikki tekur við starvi sum landsstýrismaður« verða strikað. | § 1. I lagtingslov nr. 38 af 5. august 1971 om vederlag til lagtingsmænd § 2 foretages følgende ændring: Ordene: »ikke bliver medlem af landsstyret« udgår. |
| § 2. Henda lóg fær gildi beinan vegin. | § 2. Denne lov træder i kraft straks. |

2. viðgerð 8. mai. Atkvøðugreiðslan 9. mai. Broytingaruppskot frá nevndini til § 1 — lóg nr. 37 — varð samtykt við 26-0, uppskot landsstýrisins § 1 soleiðis broytt samtykt við 28-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 31-0 atkvøðum.

Broyting frá meirilutanum á nevndini til § 1 — lóg nr. 39 — samtykt við 21-0, § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. Uppskotið soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð við 25-1 atkvøðum.

Broyting frá meirilutanum í nevndini til § 1 — lóg nr. 38 — sam-

tykt við 24-0, § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. Úppskotið soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð við 25-0 atkvøðum.

3. viðgerð 9. mai. Broyting í løgtingslóg nr. 37 endaliga samtykt við 30-0, nr. 38 við 25-1 og nr. 39 við 27-1 atkvøðum.

F.L.j.nr. 390-3-11. Lóg nr. 66, 67 og 68 frá 7. juni 1984.

---

# 136. Broyting í løgtingslóg um fiskiveiðu á landleiðini.

Ár 1984, týsdagin 11. apríl legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broytiug í løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978, § 5, um fiskiveiðu á landleiðini.**

§ 1. Í løgtingslóg nr. 8 frá 22. mars 1978 um fiskiveiðu á landleiðini við seinni broytingum verður § 5, 3. stk. broytt til:

**lagtingslov om ændring i lagtingslov nr. 8 af 29. marts 1978, § 5, om fiskeri på fisketerritoriet.**

§ 1. I lagtingslov nr. 8 af 22. marts 1978 om fiskeri på fisketerritoriet med senere ændringer ændres §5, stk. 3 til:

»Brot móti kunngerðum landsstýrisins eftir § 4 koma undir bót. Haraftrat kann loyvið verða tikið aftur, um førarin av skipinum er skuldsettur fyri brot móti reglunum í loyvinum, og eisini kann allur fiskireiðskapur, so sum net, lemmar, wirar, línur, uppstandarar v.m. og fongur koma undir konfiskatión. Skipið kann eisini heftast til rindingar av bót og kostnað. Fiskiloyvið kann eisini verða tikið aftur, tá førarin av skipinum er skuldsettur fyri brot móti §§ 2, 3 ella 4 annars í hesi lóg.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin. «

»Overtrædelse af landsstyrets bekendtgørelse i henhold til § 4 straffes med bøde. Desuden kan fiskeritilladelsen tilbageholdes, såfremt føreren af skibet er sigtet for overtrædelse af reglerne i fiskeritilladelsen, tillige kan samtlige fiskeredskaber, herunder net, lemme, slæbetrosser, liner, opstandere m.v. og fangst konfiskeres. Skibet kan også beslaglægges til dækning af bøde og omkostninger. Fiskeritilladelsen kan også tilbageholdes, såfremt føreren af skibet er sigtet for overtrædelse af reglerne i §§ 2, 3 og 4 i denne lov.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks. «

**Viðmerkingar:**

Millum teir møguleikar, ið landsstýrið sambært grein 4 í løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978 um fiskivciðu á landleiðini hevur til at regulera fiskiskapin við fiskiførum, ið eru skrásett og heimahoyrandi í Kongaríkinum, er at treyta fiskiskapin av veiðiloyvi.

Fyri at sleppa undan møguligum iva um, hvørt landsstýrið hevur heimild til at taka eitt veiðiloyvi aftur innan fyri tað tíðarskeið, ið loyvið umfatar, ynskir landsstýrið henda møguleika lógfestan, um so er, at skipið brýtur lóg, kunngerð ella tær treytir, ið ásettar eru í sjálvum loyvinum.

Fyri at sleppa undan misskiljingum verður eisini skotið upp, at hetta umfatar brot ímóti §§ 2 og 3, ið umfata útlendsk skip á landleiðini.

1. viðgerð 26. apríl. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 4. mai legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er lagt fram av Føroya Landsstýri tann 12. apríl 1984 og við 1. viðgerð 26. í s.m. beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at í § 1 í uppskotinum í staðin fyri orðið »skuldsettur« verður sett »dømdur« og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi

### broytingaruppskot

til uppskot landsstýrisins:

| | |
|---|---|
| Í § 1 verður í staðin fyri orðið »skuldsettur« sett »dømdur«. | I § 1 indsættes i stedet for ordet »sigtet«: »dømt«. |

Við hesari broyting í tveimum førum mælir ein samd nevnd tinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 7. mai. Broyting frá nevndini til § 1 samtykt við 32-0, § 1 soleiðis broytt samtykt við 32-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 32-0 atkvøðum.

3. viðgerð 8. mai. Málið endaliga samtykt við 32-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1500-1-7-3. Lóg nr. 76 frá 12. juli 1984.

---

# 137. Manningarlógin.

Ár 1984, týsdagin 11. apríl legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

## Uppskot

## til

**løgtingslóg um manning av skipum.**

§ 1. Henda lóg fevnir øll føroysk skip ella før.

§ 2. Eftir hesi lóg er at skilja:
1. »Fiskiskip«: Skip, ið hevur fiskiloyvisbræv.

2. »Ferðamannaskip«: Skip, ið flytir ella er útgjørt at flyta meira enn 12 ferðafólk.

3. »Farmaskip«: Skip, ið ikki kemur undir avmarkingarnar 1 og 2.
4. »Tons«: Registaratons brutto, sum tilskilað eina hvørja tíð í málibrævi skipsins.
5. »Kiliwatt« (kW): Tann fyri høvuðs- og hjálpimaskinu alment tilskilaða megi, funnin á royndarplani.

6. »Eldstaður«: Eldpípur í eldrørsketlum og brenntarar í vatnrørsketlum.
7. »Heimasigling«: Sigling innanfyri 100 sjómíl úr landi frá Føroyum.

8. »Norðhavssigling«:
Heimasigling og sigling á Atlantshavinum norðanvert 30° n.br.

**lagtingslov om skibes bemanding.**

§ 1. denne lov omfatter ethvert færøsk skib eller fartøj.

§ 2. I denne lov forstås ved:
1. »Fiskeskib«: Skib, der er forsynet med fiskericertifikat.
2. »Passagerskib«: Skib, der befordrer eller er indrettet til at befordre flere end 12 passagerer.
3. »Fragtskib«: Skib, der ikke falder under definitionerne 1 og 2.
4. »Tons«: Registertons brutto som til enhver tid angivet i skibets målebrev.
5. »Kilowatt« (kW). Den for hoved- og hjælpemaskiner officielt angivne kraft, der fremkommer på prøveplanen.
6. »Fyr«: Fyrkanaler i ildrørskedler og brændere i vandrørskedler.
7. »Kystfart«: Sejlads, der ikke strækker sig længere end 100 sømil fra land af Færøerne.
8. »Nordhavssejlads«:
Kystfart samt fart i Atlanterhavet nord for 30° n.br.

9. »Atlanthavssigling«:
Norðhavssigling og sigling á Atlantshavinum norðanvert 40° s. br.

§ 3. Á øllum førum skal vera førari og herafturat um borð tann manning, ið neyðug er at tryggja mannalív á sjónum.
*2. stk.* Á førum, har manningin ikki er tilskilað eftir hesi lóg, kann landsstýrið seta manningarreglurnar.

§ 4. Á førum, sum her er skilað til, lektarar undantiknir, skulu vera førari og navigatiónsyvirmenn við sjóvinnubrævi eftir yvirlitinum niðanfyri:

9. »Atlanterbavssejlads«:
Nordhavssejlads samt fart i Atlanterhavet nord for 40° s. br.

§ 3. På ethvert fartøj skal der være en fører, ligesom der ombord skal være det af hensyn til sikkerheden for menneskeliv på søen nødvendige mandskab.
*Stk. 2.* For fartøjer, hvis bemanding ikke er fastsat i denne lov, kan bemandingen fastsættes af landsstyret.

§ 4. På nedenstående fartøjer, bortset fra lægtere, skal der være fører og navigationsofficerer med sønæringsbevis i overensstemmelse med nedenstående skema:

| A. FISKIMÖR<br>FISKEFARTØJER | | | |
|---|---|---|---|
| Tons<br><br>Tons | Heimasigling<br><br>Kystfart | Atlanthavs-sigling<br>Atlanterhavs-sejlads | Óskend sigling<br><br>Uindskrænket fart |
| 20 og yvir men ikki yvir 150 | Heimaskipari | Skipari | Skipsførari á 2. stigi |
| 20 og derover men ikke over 150 | Kystskipper | Bestimaður | Stýrimaður á 2. stigi |
| 150 og yvir, men ikki yvir 500<br><br>150 og derover men ikke over 500 | Heimaskipari<br>Bestimaður við heimaskipara-royrnd<br>Kystskipper<br>Bedstemand<br>med hjemme-skipperprøve | Skipper<br>Bedstemand | Skibsfører af 2. grad<br><br>Styrmand af 2. grad |
| 500 og yvir, men ikki yvir 1400<br><br>500 og derover men ikke over 1400 | Skipari<br>Bestimaður<br><br>Skipper<br>Bedstemand | | |
| Yvir 1400<br><br><br><br><br><br>Over 1400 | Skipari<br>2 bestimenn<br><br><br><br><br>Skipper<br>2 bedstemænd | | Skipsførari á 1. stigi<br>Stýrimaður á 1. stigi<br>Stýrimaður á 2. stigi<br>Skibsfører af 1. grad<br>Styrmand af 1. grand<br>Styrmand af 2. grad |

| B. FARMASKIP<br>FRAGTSKIBE | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Tons<br><br>Tons | Heimasigling<br><br>Kystfart | Norðhavs-sigling<br>Nordhavs-sejlads | Atlanthavs-sigling<br>Atlanterhavs-sejlads | Óskerd sigling<br><br>Vindskrænket fart |
| 20 og yvir men ikki yvir 150<br>20 og derover men ikke over 150 | Heimaskipari<br>Bestimaður við dugnaskapsbrævi<br>Kystskipper<br>Bedstemand med dueligheds-bevis | | | |
| 150 og yvir, men ikki yvir 500<br><br>150 og derover, men ikke over 500 | Skipari<br>Bestimaður við heima-skipararoynd<br>Skipper<br>Bedstemand med skipper-prøve | Skipari<br>Bestimaður<br><br>Skipper<br>Bedste-mand | Skipsførari á 2. stigi<br>Stýrimaður á 2. stigi<br>Skibsfører af 2. grad<br>Styrmand af 2. grad | Skipsførari á 2. stigi<br>2 stýrimenn á 2. stigi<br>Skibsfører af 2. grad<br>2 styrmænd af 2. grad |
| 500 og yvir men ikki yvir 1400<br><br>500 og derover, men Ikke over 1400 | Skipsførari á 2. stigi<br>Bestimaður<br><br>Skibsfører af 2. grad<br>Bedstemand | Skipsførari á 2. stigi<br>Stýrimaður á 2. stigi<br>Bestimaður<br><br>Skibsfører af 2. grad<br>Styrmand af 2. grad<br>Bedste-mand | Skipsførari á 1. stigi<br>2 stýrimenn á 2. stigi<br><br>Skibsfører af 1. grad<br>2 styrmænd af 2. grad | Skipsførari á 1. stigi<br>Stýrimaður á 1. stigi<br>Stýrimaður á 2. stigi<br><br>Skibsfører af 1. grad<br>Styrmand af 1. grad<br>Styrmand af 2. grad |
| yvir 1400<br>over 1400 | Skipsførari á 1. stigi<br>Stýrimaður á 1. stigi<br>2 stýrimenn á 2. stigi | | Skibsfører af 1. grad<br>Styrmand af 1. grad<br>2. styrmænd af 2. grad | |

C Ferðamannafør
Passagerfartøjer

| Tons<br><br>Tons | Heimasigling<br><br>Kystfart | Norðhavssigling<br>Nordhavssejlads | Óskerd sigling<br><br>Uindskrænket fart |
|---|---|---|---|
| 8 og yvir men undir 20<br><br>8 og derover, men under 20 | Skipari við dugnaskapsbrævi<br>Skipper med dueligheds-bevis | | |
| 20 og yvir, men ikki yvir 100<br><br>20 og derover, men ikke over 100 | Heimaskipari, Bestimaður við dugnaskaps-brævi<br>Kystskipper Bedstemand med dueligheds-bevis | Skipari Bestimaður<br><br>Skipper Bedstemand | |
| 100 og yvir men ikki yvir 500<br><br>100 og derover, men ikke over 500 | Skipari Bestimaður<br><br>Skipper Bedstemand | Skipsførari á 2. stigi Bestimaður<br><br>Skibsører af 2. grad Bedstemand | Skipsførari á 2. stigi Stýrimaður á 2. stigi<br>Skibsører af 2. grad Styrmand af 2. grad |
| 500 og yvir men ikki yvir 800<br><br>500 og derover. men ikke over 800 | Skipsførari á 2. stigi Stýrimaður á 2. stigi<br>Skibsører af 2. grad Styrmand af 2. grad | Skipsførari á 1. stigi Stýrimaður á 1. stigi Stýrimaður á 2. stigi<br>Skibsører at 1. grad Styrmand at 1. grad Styrmand af 2. grad | |
| 800 og yvir men ikki yvir 1400<br><br>800 og derover men ikke over 1400 | Skipsførari á 1. stigi, stýrimaður á 1. stigi stýrimaður á 2. stigi<br><br>Skibsører af 1. grad, styrmand af 1. grad, styrmand af 2. grad | | |
| Yvir 1400<br><br>Over 1400 | Skipsførari á 1. stigi, stýrimaður á 1. stigi, 2 stýrimenn á 2. stigi<br>Skibsører af 1. grad, styrmand af 1. grad, 2 styrmænd af 2. grad | | |

II

§ 5. Á maskindrivnum skipum skulu verða maskinyvirmenn við sjóvinnubrævi, sum skilað til í fylgjandi manningartalvum:

A — »Tógarar og kraftblokkaskip«.

B — »Fiskiskip, sum nýta líni, gørn, snellur og snøri«.

C — »Farmaskip«.

a. Har talan er um verksmiðjuskip ella skip við serligari útgerð, skal tal av hjálparfólki út yvir tey í lógini ásettu, setast av landsstýrinum í hvørjum føri sær eftir tilmæli frá Maskinmeistarafelagnum.

b. Við skipum, ið hava maskinmegi upp á 900 kW og undir, har lastin, ella partur av lastini, eru til køling ella frysting, krevst at maskinisturin hevur prógv í køliteknikki.

c. Maskinmanning á ferðamannaskipum verður sett av Landsstýrinum eftir tilmæli frá Maskinmeistarafelagnum. Manningarkrøvini skulu tó í ongum føri verða linari enn skilað til í manningartalvu C (frystiskip).

§ 5. På maskindrevne skibe skal der være maskinofficerer med sønæringsbevis i overensstemmelse med nedenstående bemandingsoversigt:

A — »Trawlere og kraftblokskibe«.

B — »Fiskeskib, der fisker med langline, garn, snelle og håndsnøre«.

C — »Fragtskib«.

a. Hvor der er talen om fabriksskib med særlig indretning, skal antallet af medhjælpere ud over de i loven normerede, fastsættes af landsstyret i hvert enkelt tilfælde. Efter indstilling fra maskinmesterforeningen.

b. Med skibe, der har maskinkraft på 900 kW og derunder, hvor lastrummet, eller dele af lasten, er indrettet til køling eller frysning, kræves, at maskinisten har erhvervet bevis i køleteknik.

c. Maskinbesætningen på passagerfartøjer fastsættes af landsstyret efter indstilling fra maskinmesterforeningen. Kravene til mandskabet kan dog i intet tilfælde være mindre strenge end som specificeret i bemandingsoversigt C (fryseskibe).

A

| T O G A R A R  OG  K R A F T B L O K K A S K I P<br>T R A W L E R  OG  K R A F T B L O K K E S K I B | | |
|---|---|---|
| Megi kW x)<br>Høvuðsmask.<br>Effekt kW x)<br>Hovedmask. | Íðnaðar- og feskfisk<br>(tilvirkað í landi)<br>Industri- og fesk-fisk<br>(tilvirket i land) | Saltfisk, flak, mjøl, fryst. v.m.<br>(tilvirkað umborð)<br>Saltfisk, filet, mel, fryse. m.v.<br>(tilvirket ombord) |
| Upp t. 300<br>Op til 300 | Motorpassari<br>Motorpasser | Motorpassari<br>Motorpasser |
| Yvir 300, men ikki yvir 450<br>Over 300, men ikke over 450 | Motorpassari<br>Motorpasser | 2 motorpassarar<br>2 motorpassere |
| Yvir 450, men ikki yvir 900<br>Over 450, men ikke over 900 | Maskinistur<br>Motorpassari<br>Maskinist<br>Motorpasser | Maskinistur<br>Maskinistur<br>Maskinist<br>Maskinist |
| Yvir 900, men ikki yvir 1500<br>Over 900, men ikke over 1500 | Maskinmeist. 2. st.<br>Maskinistur<br>Maskinmester 2. grad<br>Maskinist | 2 maskinmeist. 2. st.<br>Maskinistur<br>2 maskinmest. 2.grad<br>Maskinist |
| Yvir 1500, men ikki yvir 3000<br>Over 1500, men ikke over 3000 | Maskinmeist. 1.st.<br>Maskinmeist. 2.st.<br>Maskinistur<br>Maskinmest. 1.grad<br>Maskinmest. 2. grad<br>Maskinist | Maskinmeist. 1.st.<br>Maskinmeist. 2.st.<br>Maskinistur<br>Hjálparfólk<br>Maskinmest. 1.grad<br>Maskinmest. 2. grad<br>Maskinist<br>Assistent |
| Yvir 3000<br><br><br><br>Over 3000<br><br><br><br> | Maskinstjóri<br>Maskinmeist. 1.st.<br>Maskinmeist. 2.st.<br>Maskinistur<br>Maskinchef<br>Maskinmest. 1. grad<br>Maskinmest. 2. grad<br>Maskinist | Maskinstjóri<br>Maskinmeist. 1.st.<br>Maskinmeist. 2. st.<br>Maskinistur<br>Hjálparfólk<br>Maskinchef<br>Maskinmest. 1. grad<br>Maskinmest. 2. grad<br>Maskinist<br>Assistent |

x) 1 kW = 1,3596 Hk.

B

| FISKISKIP, SUM NÝTA LÍNU, GØRN, SNELLU OG SNØRI.<br>FISKESKIB, SOM BRUGER LANGLINE, GARN, SNELLE OG HÅNDSNØRE. | | |
|---|---|---|
| Megi kW x)<br><br>Høvuðsmask.<br>Effekt kW x)<br>Hovedmask. | Feskfisk<br><br>(tilvirkað í landi)<br>Ferskfisk<br><br>(Tilvirket i land) | Saltfisk, flak, heilfrystan fisk v.m.<br>(tilvirkað umborð)<br>Saltfisk, filét, helfrosset fisk m.v.<br>(tilvirket ombord) |
| Upp t. 300<br>Op til 300 | Motorpassari<br>Motorpasser | Motorpassari<br>Motorpasser |
| Yvir 300, men ikki yvir 450<br>Over 300, men ikke over 450 | Motorpassari<br><br>Motorpasser | 2 motorpassarar<br><br>2 motorpassere |
| Yvir 450, men ikki yvir 900<br>Over 450, men ikke over 900 | Maskinistur<br><br>Maskinist | Maskinistur xx)<br>Maskinistur<br><br>Maskinist xx)<br>Maskinist |
| Yvir 900, men ikki yvir 1500<br>Over 900, men ikke over 1500 | Maskinmeist. 3.st.<br>Motorpassari<br><br>Maskinmeist. 3.grad<br>Motorpasser | Maskinmeist. 2. st.<br>Maskinistur<br><br>Maskinmest. 2. grad<br>Maskinist |
| Yvir 1500, men ikki yvir 3000<br>Over 1500, men ikke over 3000 | Maskinmeist. 2.st.<br>Maskinmeist. 3.st.<br>Maskinistur<br>Maskinmest. 2.grad<br>Maskinmest. 3.grad<br>Maskinist | Maskinmeist. 1. st.<br>Maskinmeist. 2. st.<br>Maskinistur<br>Maskinmest. 1.grad<br>Maskinmest. 2.grad<br>Maskinist |
| Yvir 3000<br><br><br><br><br>Over 3000 | Maskinmeist. 1.st.<br>Maskinmeist. 2.st.<br>Maskinistur<br>Hjálparfólk<br><br>Maskinmest.1. grad<br>Maskinmest.2. grad<br>Maskinist<br>Assistent | Maskinstjóri<br>Maskinmeist. 1.st.<br>Maskinmeist. 2.st.<br>Maskinistur<br>Hjálparfólk<br>Maskinchef<br>Maskinmest. 1. grad<br>Maskinmest. 2. grad<br>Maskinist<br>Assistent |

x) 1 kW = 1,3596 Hk.

xx) Kvalitetskniskt prógv
Kvalitetsnisk certifikat

C

| FARMASKIP<br>FRAGTSKIB | | |
|---|---|---|
| Megi kW x)<br>Høvuðsmask.<br>Effekt kW x)<br>Hovedmask. | Turrlastskip<br><br>Tørlastskib | Frysliskip<br><br>Fryseskib |
| Upp t. 450<br>Op til 450 | Motorpassari<br>Motorpasser | Maskinistur<br>Maskinist |
| Yvir 450,<br>men ikki<br>yvir 900<br>Over 450,<br>men ikke<br>over 900 | Maskinistur<br>Motorpassari<br><br>Maskinist<br>Motorpasser | 2 maskinistar xx)<br><br>2 maskinister xx) |
| Yvir 900,<br>men ikki<br>yvir 1800<br>Over 900<br>men ikke<br>over 1800 | Maskinmeist. 2.st.<br>Maskinmeist. 3.st.<br>Hjálparfólk<br>Maskinmest. 2.grad<br>Maskinmest. 3.grad<br>Assistent | Maskinmeist. 2.st.<br>Maskinmeist. 3.st.<br>Hjálparfólk<br>Maskinmest. 2.grad<br>Maskinmest. 3.grad<br>Assistent |
| Yvir 1800,<br>men ikki<br>yvir 3000<br><br>Over 1800<br>men ikke<br>over 3000 | Maskinmeist. 1.st.<br>Maskinmeist. 2.st.<br>Maskinistur<br>Hjálparfólk<br>Maskinmest. 1.grad<br>Maskinmest. 2. grad<br>Maskinist<br>Assistent | Maskinstjóri<br>Maskinmeist. 2.st.<br>Maskinistur<br>Hjálparfólk<br>Maskinchef<br>Maskinmest. 2.grad<br>Maskinist<br>Assistent |
| Yvir 3000,<br>men ikki<br>yvir 4500<br><br><br>Over 3000,<br>men ikke<br>over 4500 | Maskinstjóri<br>Maskinmeist. 1.st.<br>Maskinmeist. 2.st.<br>Maskinistur<br>2 hjálparfólk<br>Maskinchef<br>Maskinmest. 1.grad<br>Maskinmest. 2.grad<br>Maskinist<br>2 assistenter | Maskinstjóri<br>Maskinmeist. 1.st.<br>Maskinmeist. 2.st.<br>Maskinistur<br>2 hjálparfólk<br>Maskinchef<br>Maskinmest. 1.grad<br>Maskinmest. 2.grad<br>Maskinist<br>2 assistenter |
| Yvir 4500<br><br><br><br>Over 4500 | Maskinstjóri<br>Maskinmeist. 1.st.<br>Maskinmeist. 2.st.<br>Maskinistur<br>3 hjálparfólk<br>Maskinchef<br>Maskinmest. 1.grad<br>Maskinmest. 2.grad<br>Maskinist<br>3 assistenter | Maskinstjóri<br>Maskinmeist. 1.st.<br>Maskinmeist. 2.st.<br>Maskinistur<br>3 hjálparfólk<br>Maskinchef<br>Maskinmest. 1.grad<br>Maskinmest. 2.grad<br>Maskinist<br>3 assistenter |

x) 1 kW = 1.3596 Hk

xx) Køliteknisk prógv
Køleteknisk certifikat

**§ 6.** Á førum, ið eftir galdandi forskriftum skulu vera útgjørd við radioútbúnað, skulu til hesa tænastu vera radioavgreiðslumenn við tørvandi loyvisbrævi.

**§ 7.** Á førum, har manningin er størri enn 8 men ikki størri enn 20, skal vera kokkur, og á førum, har manningin er størri eisini kokkadrongur. Í hesum tølum verður kokkur ikki taldur. Á ferðamannaskipum kann landsstýrið fyriseta størri tal av kokkum.

**§ 8.** Á maskindrivnum farma- og ferðamannaskipum yvir 300 tons, skal vera deksmanning eftir yvirlitinum niðanfyri:

**§ 6.** På fartøjer, der efter gældende forskrifter skal være udstyret med radioanlæg, skal der til betjening heraf være ansat radioekspedienter med fornødent certifikat.

**§ 7.** På fartøjer med en besætning over 8, men ikke over 20 personer, skal der være en kok og på fartøjer med større besætning desuden en kokkedreng. I de nævnte besætningstal indgår kokken ikke. På passagerskibe kan landsstyret foreskrive et større antal af kokke.

**§ 8.** På maskindrevne fragt- og passagerskibe over 300 tons skal der være dæksmandskab i overensstemmelse med nedenstående skema:

| Tons | Báts-menn<br>Bådsmænd | Matrós-ar<br>Matroser | Lætt-matrós-ar<br>Letmatroser | Ung-menn<br>Ungmænd | Deks-dreing-ir<br>Dæksdrenge | Til-sam-ans<br>I alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Yvir 300, men ikki yvir 400<br>Over 300, men ikke over 400 | 0 | 0 | 1 | 1 | 1 | 3 |
| Yvir 400, men ikki yvir 500<br>Over 400, men ikke over 500 | 0 | 1 | 1 | 1 | 1 | 4 |
| Yvir 500, men ikki yvir 1400<br>Over 500, men ikke over 1400 | 0 | 2 | 2 | 2 | 0 | 6 |
| Yvir 1400, men ikki yvir 2000<br>Over 1400, men ikke over 2000 | 0 | 3 | 1 | 2 | 1 | 7 |
| Yvir 2000<br>Over 2000 | 1 | 3 | 1 | 2 | 1 | 8 |

*2. stk.* Royndur timburmaður kann vera fyri matrós og óroyndur kann vera fyri lættmatrós.
*3. stk.* Um deksmaður hevur tikið hýru soleiðis, at hann hevur skyldu at inna aðra tænastu enn dekstænastu, er hann ikki at telja við í tilskilaðu deksmanning.

*Stk. 2.* En befaren tømmermand kan erstatte en matros og en ubefaren tømmermand en letmatros.
*Stk. 3.* Dersom en til dæksmandskabet hørende sømand er forhyret således, at han er pligtig at gøre anden tjeneste end dækstjeneste, kan han ikke medregnes i det foreskrevne dæksmandskab.

**§ 9.** Um tað fyri tryggleikan á ferðamannaskipum er neyðugt, kann landsstýrið eftir tilmæli frá Maskinmeistarafelagnum fyrisseta neyðugt tal av motormonnum.

**§ 9.** Såfremt det er nødvendigt for sikkerheden på passagerfartøjer, kan landsstyret efter indstilling fra maskinmesterforeningen foreskrive nødvendigt antal af motormænd.

### Sjóvinnubrøv v.m.

**§ 10.** At fáa dugnaskapsbræv í sigling krevst:
a. at maður hevur staðið dugnaskapsroynd í sigling, fyriskipað av landsstýrinum;
b. at hann hevur staðið sýnsroynd, fyriskipað av landsstýrinum.

### Sønæringsbeviser m.v.

**§ 10.** Til erhvervelse af dueligfiedsbevis i sejlads kræves:
a. at vedkommende har bestået en af landsstyret fastsat dueligfiedsprøve i sejlads;
b. at han har bestået en af landsstyret fastsat synsprøve.

**§ 11.** At fáa vinnubræv sum bestimaður við heimaskipararoynd krevst:
a. at maður aftaná at hava fylt 15 ár hevur gjørt dekstænastu á førum í 24 mánaðir, av hesum í minsta lagi 12 mánaðir á skipum yvir 20 tons;
b. at hann hevur staðið heimaskipararoynd;

**§ 11.** Til erhvervelse af bevis som bedstemand med kystskipperprøve kræves:
a. at vedkommende efter det fyldte 15 år har gjort dækstjeneste i fartøjer i 24 måneder, hvoraf mindst 12 måneder i skibe over 20 tons;
b. at han har bestået kystskippereksamen;

c. at hann hevur staðið sýnsroynd, fyriskipað av landsstýrinum.

**§ 12.** At fáa vinnubræv sum heimaskipari krevst:
a. at maður hevur staðið heimaskiparaprógv;
b. at hann undir umstøðum, har prógv sum hestimaður við heimaskiparaprógvi krevst, hevur gjørt tænastu í 12 mánaðir, ella í tilsvarandi starvi á fremmandum skipi;
c. at hann hevur heimarætt;
d. at hann hevur fylt 21 ár;
e. at hann hevur staðið sýnsroynd, fyriskipað av landsstýrinum.

**§ 13.** At fáa vinnubræv sum bestimaður krevst:
a. at maður eftir at hava fylt 15 ár hevur gjørt dekstænastu í 24 mánaðir, av hesum 12 mánaðir á skipum yvir 20 tons uttanfyri heimasigling;
b. at hann hevur staðið skipararoynd;
c. at hann hevur staðið sýnsroynd, fyriskipað av landsstýrinum.

**§ 14.** At fáa vinnubræv sum skipari krevst:
a. at hann hevur staðið skipararoynd;
b. at hann undir umstøðum, har prógv sum bestimaður krevst, hevur gjørt tænastu í 12 mán-

c. at han har bestået en af landsstyret fastsat synsprøve.

**§ 12.** Til erhvervelse af bevis som kystskipper kræves:
a. at vedkommende har bestået kystskippereksamen;
b. at han under forhold, hvor bevis som bedstemand med kystskipperprøve kræves, har gjort tjeneste i 12 måneder eller i tilsvarende stilling på fremmed skib;
c. at han har indfødsret;
d. at han er fyldt 21 år;
e. at han har bestået en af landsstyret fastsat synsprøve.

**§ 13.** Til erhvervelse af bevis som bedstemand kræves:
a. at vedkommende efter det fyldte 15 år har gjort dækstjeneste i 24 måneder, heraf 12 måneder i skibe over 20 tons udenfor kystfart;
b. at han har bestået skippereksamen;
c. at han har bestået en af landsstyret fastsat synsprøve.

**§ 14.** Til erhvervelse af bevis som skipper kræves:
a. at vedkommende har bestået skippereksamen;
b. at han under forhold, hvor bevis som bedstemand kræves, har gjort tjeneste i 12

aðir, ella í tilsvarandi starvi á fremmandum skipi;
c. at hann hevur heimarætt;
d. at hann hevur fylt 21 ár;
e. at hann hevur staðið sýnsroynd, fyriskipað av landsstýrinum.

måneder, eller i tilsvarende stilling i fremmed skib;
c. at han har indfødsret;
d. at han er fyldt 21 år;
e. at han har bestået en af landsstyret fastsat synsprøve.

**§ 15.** At fáa vinnubræv sum stýrimaður á 2. stigi krevst:
a. at maður eftir at hava fylt 15 ár hevur gjørt dekstænastu í 47 mánaðir á skipum upp á 20 tons og størri, av hesum 24 mánaðir á skipum yvir 60 tons uttanfyri heimasigling og av hesum aftur 6 mánaðir á farma- ella ferðamannaskipum yvir 200 tons;
b. at hann hevur staðið stýrimannaroynd;
c. at hann hevur staðið sýnsroynd, fyriskipað av landsstýrinum.

**§ 15.** Til erhvervelse af bevis som styrmand af 2. grad kræves:
a. at vedkommende efter det fyldte 15. år har gjort dækstjeneste i 47 måneder i skibe på 20 tons og derover, hvoraf 24 måneder i skibe over 60 tons udenfor kystfart og heraf 6 måneder på fragt eller passagerskibe over 200 tons;
b. at han har bestået styrmandseksamen;
c. at han har bestået en af landsstyret fastsat synsprøve.

**§ 16.** At fáa vinnubræv sum stýrimaður á 1. stigi krevst, at maður umframt at lúka treytirnar eftir § 15 hevur staðið skipsførararoynd.

**§ 16.** Til erhvervelse af bevis som styrmand af 1. grad kræves, at vedkommende foruden at opfylde de i § 15 fastsatte betingelser har bestået skibsførereksamen.

**§ 17.** At fáa vinnubræv sum skipsførari í 2. stigi krevst:
a. at maður hevur staðið stýrimannaroynd;
b. at hann undir umstøðum, har prógv sum stýrimaður á 2. stigi krevst, hevur gjørt tænastu;

**§ 17.** Til erhvervelse af bevis som skibsfører af 2. grad kræves:
a. at vedkommende har bestået styrmandseksamen;
b. at han under forhold hvor bevis som styrmand af 2. grad kræves, har gjort tjeneste:

1) í 12 mánaðir, av hesum 6 mánaðir sum 1. ella einasti stýrimaður ella
2) í 36 mánaðir, av hesum 18 mánaðir sum 2. stýrimaður á skipi yvir 1400 tons ella
3) í tilsvarandi starvi á fremmandum skipi;

c. at hann hevur heimarætt;
d. at hann hevur fylt 23 ár;
e. at hann hevur staðið sýnsroynd, fyriskipað av landsstýrinum.

**§ 18.** At fáa vinnubræv sum skipsførari á 1. stigi krevst:

a. at maður hevur staðið skipsføraraoynd;
b. at hann hevur gjørt tænastu:
   1) í 24 mánaðir undir umstøðum, har prógv sum skipsførari á 2. stigi krevst;
   2) undir umstøðum, har prógv sum stýrimaður á 2. stigi krevst, annaðhvørt í 24 mánaðir, av hesum 12 mánaðir, sum 1. ella einasti stýrimaður á skipi yvir 300 tons, ella í 60 mánaðir, av hesum 36 mánaðir sum 2. stýrimaður á skipi yvir 1400 tons; ella
   3) í tilsvarandi starvi á fremmandum skipi;
c. at hann hevur heimarætt;
d. at hann hevur fylt 25 ár;
e. at hann hevur staðið sýns-

1) i 12 måneder, hvoraf 6 måneder som 1. eller eneste styrmand eller
2) i 36 måneder, hvoraf 18 måneder som 2. styrmand i skibe over 1400 tons eller
3) i tilsvarende stilling på fremmed skib;

c. at han har indfødsret;
d. at han er fyldt 23 år;
e. at han har bestået en af landsstyret fastsat synsprøve.

**§ 18.** Til erhvervelse af bevis som skibsfører af 1. grad kræves:

a. at vedkommende har bestået skibsførereksamen;
b. at han har gjort tjeneste:
   1) i 24 måneder under forhold, hvor bevis som skibsfører af 2. grad kræves;
   2) under forhold, hvor bevis som styrmand af 2. grad kræves, enten i 24 måneder, hvoraf 12 som 1. eller enestyrmand i skib over 300 tons, eller i 60 måneder, hvoraf 36 måneder som 2. styrmand i skib over 1400 tons; eller
   3) i tilsvarende stilling i fremmed skib;

c. at han har indfødsret;
d. at han er fyldt 25 år;
e. at han har bestået en af landsstyret fastsat synsprøve.

roynd, fyriskipað av landsstýrinum.

**§ 19.** Sjóvinnubrøvini eftir §§ 10-18 geva rætt at inna tænastu bæði á fiskiskipi og øðrum skipi, um 6 mánaðir av tí kravdu dekstænastu hevur verið á fiskiskipi og 6 mánaðir á øðrum skipi. Hevur viðkomandi ikki 6 mánaða tænastu annaðhvørt á fiskiskipi ella øðrum skipi, fær vinnubrævið árit um, at tað bert verður at nýta til tænastu ávikavist á øðrum skipi ella fiskiskipi.

**§ 20.** Hann, ið hevur vinnubræv sum stýrimaður, og lýkur treytirnar eftir § 14 litra c og d, jbr. eisini § 19, verður hildin eisini hava vinnubræv sum skipari.

**§ 21.** At fáa vinnubræv sum skipsmaskinistur krevst:
a. at maður hevur staðið maskinistroynd;
b. at hann hevur gjørt maskintænastu á damp- ella motorskipum í 12 mánaðir.

**§ 22.** At fáa vinnubræv sum skipsmaskinmeistari á 3. stigi krevst:
a. at maður hevur staðið maskinmeistararoynd.
b. at hann hevur gjørt maskintænastu á damp- ella motorskipum í 12 mánaðir;
c. at hann hevur fylt 21 ár.



**§ 19.** De i §§ 10-18 omhandlede sønæringsbeviser giver ret til at udføre tjeneste såvel i fiskeskibe som andet skib, såfremt 6 måneder af den forudsatte dækstjeneste er udført i fiskeskibe og 6 måneder i andet skib. Har den pågældende ikke 6 måneders tjeneste i enten fiskeskib eller andet skib, gives der beviset påtegning om, at det alene kan anvendes til tjeneste i henholdsvis andet skib eller fiskeskib.

**§ 20.** Den, der har bevis om styrmand, og som opfylder betingelserne i § 14 litra c og d jfr. også § 19, anses tillige at have bevis som skipper.

**§ 21.** Til erhvervelse af bevis som skibsmaskinist kræves:
a. at vedkommende har bestået maskinisteksamen;
b. at han har gjort maskintjeneste i damp- eller motorskibe i 12 måneder.

**§ 22.** Til erhvervelse af bevis som skibsmaskinmester af 3. grad kræves:
a. at vedkommende har bestået maskinmestereksamen.
b. at han har gjort maskintjeneste i damp- eller motorskibe i 12 måneder,
c. at han er fyldt 21 år.

**§ 23.** At fáa vinnubræv sum skipsmaskinmeistari á 2. stigi krevst:

a. at maður hevur staðið maskinmeistararoynd;
b. at hann hevur gjørt maskintænastu á damp- ella motorskipum í 24 mánaðir;
c. at hann hevur fylt 21 ár.

**§ 24.** At fáa vinnubræv sum skipsmaskinmeistari á 1. stigi krevst:

a. at maður eftir at hava fingið vinnubræv sum skipsmaskinmeistari á 2. stigi hevur siglt í 12 mánaðir í starvi, har hetta vinnubræv krevst, ella í tilsvarandi starvi á fremmandum skipi;
h. at hann hevur fylt 25 ár.

**§ 25.** At fáa vinnubræv sum skipsmaskinstjóri krevst:

a. at maður eftir at hava fingið vinnubræv sum skipsmaskinmeistari á 1. stigi hevur siglt í 12 mánaðir í starvi, har hetta vinnubræv krevst, ella í tilsvarandi starvi á fremmandum skipi.
b. at maður hevur staðið víðkaðu maskinmeistararoyndina.

**§ 26.** Maður við maskinistprógvi (uttan vinnubræv) kann mynstra sum maskinistur við skipum, ið hava maskinmegi yvir 1500 kw.

*2. stk.* Maður við maskinmeistara-

**§ 23.** Til erhvervelse af bevis Sum skibsmaskinmester af 1. grad kræves:

a. at vedkommende har bestået maskinmestereksamen;
b. at han har gjort maskintjeneste i damp- eller motorskibe i 24 måneder;
c. at han er fyldt 21 år.

**§ 24.** Til erhvervelse af bevis som sibsmaskinmester af 1. grad kræves:

a. at vedkommende efter erhvervelsen af bevis som skibsmaskinmester af 2. grad har sejlet i 12 måneder i stilling, hvor sådant bevis kræves eller i tilsvarende stilling i fremmed skib;
b. at han er fyldt 25 år.

**§ 25.** Til erhvervelse af bevis som skibsmaskinchef kræves:

a. at vedkommende efter erhvervelsen af bevis som skibsmaskinmester af 1. grad har sejlet i 12 måneder i stilling, hvor sådant bevis kræves eller i tilsvarende stilling på fremmed skib.
b. at vedkommende har bestået den udvidede maskinmestereksamen.

**§ 26.** Person med maskinisteksamen (uden sønæringsbevis) kan påmønstre som maskinist med skibe med maskinkraft over 1500 kW.

prógvi (uttan vinnubræv) kann mynstra sum maskinistur ella maskinmeistari á 3. stigi við skipum, ið hava maskinmegi yvir 1500 kw.

*3. stk.* Fyri at fáa vinnubræv eftir §§ 21-23 krevst, at maður hevur gjørt maskintænastu á skipum, ið hava maskinmegi yvir 450 kW.

*Stk. 2.* Person med maskinmestereksamen (uden sønæringsbevis) kan påmønstre som maskinist eller maskinmester af 3. grad med skibe med maskinstyrke over 1500 kW.

*Stk. 3.* Til erhvervelse af bevis i henhold til §§ 21-23 kræves, at vedkommende har gjort maskintjeneste på skibe med maskinstyrke over 450 kW.

**§ 27.** At kunna mynstra sum ungmaður, lættmatrósur, matrósur, bátsmaður ella royndur timburmaður krevst, at viðkomandi lýkur hesar treytir:

a. Ungmaður skal hava fylt 16 ár og hava siglt í 12 mánaðir.
b. Lættmatrósur skal hava fylt 17 ár og lúka treytirnar eftir a, og haraftrat hava siglt sum ungmaður í 12 mánaðir.
c. Matrósur skal hava fylt 18 ár og lúka treytirnar eftir b, og haraftrat hava siglt sum lættmatrósur í 12 mánaðir.
d. Bátsmaður skal hava fylt 25 ár og hava siglt sum matrósur í 24 mánaðir.
e. Royndur timburmaður skal annaðhvørt lúka treytirnar eftir c ella hava siglt í 18 mánaðir eftir at hava staðið fulla læru sum timburmaður.

**§ 27.** For at kunne møustre som ungmand, letmatros, matros bådsmand eller befaren tømmermand skal vedkommende opfylde følgende betingelser:

a. En ungmand skal være fyldt 16 år og have faret til søs i 12 måneder.
b. En matros skal være fyldt 17 år og opfylde de under a omhandlede betingelser og derefter have faret til søs som ungmand i 12 måneder.
c. En matros skal være fyldt 18 år og opfylde de under b omhandlede betingelser og derefter have faret til søs som letmatros i 12 måneder.
d. En bådsmand skal være fyldt 25 år og have faret til søs som matros i 24 måneder.
c. En befaren tømmermand skal enten opfylde betingelserne under c eller have faret til søs i 18 måneder efter udstået læretid som tømrer.

**§ 28.** At kunna mynstra sum

**§ 28.** For at kunne udmønstre

kyndari ella motormaður krevst, at viðkomandi hevur fylt 19 ár og hevur gjørt maskintænastu ella tænastu á fýrplássi á skipum í 12. mánaðir.

**Almenniligar reglur.**

**§ 29.** Sjóvinnubrøvini eftir hesi lóg verða skrivað gjaldsfrí og verða gjørd eftir forskriftum, landsstýrið fyrisetir. Hann, ið fær vinnubræv á hægri stigi, gevur vinnubræv á lægri stigi, hann hevur fingið frammanundan, aftur.

*2. stk.* Dugnaskapsbrævið eftir § 10 verður skrivað av honum, ið hevur staðið fyri dugnaskapsroyndini, meðan landfútin, ella annar myndugleiki, landsstýrið fyriskipar, skrivar onnur vinnubrøv.

*3. stk.* Klaga um avgerð tikin av myndugleika, ið skrivar vinnubræv, verður løgd fyri landsstýrið, avgerð tess kann skjótast inn fyri rættin. Sjórættur in viðger málini.

**§ 30.** Sjóvinnubræv kann verða tikið frá honum, ið hevur tað, um hann sálarliga ella likamliga er so, at tað vegna almanna tryggleikan verður hildið óforsvarligt at lata hann inna tey rættindi, vinnubrævið gevur honum. Hann skal verða biðin um fyri landsstýrinum at vátta, um hann gevur seg undir hesa

som fyrbøder eller motormand skal vedkommende være fyldt 19 år og have gjort tjeneste ved maskinen eller på fyrpladsen i skibe i 12 måneder.

**Almindelige bestemmelser.**

**§ 29.** De i denne lov omhandlede sønæringsbevier udstedes uden betaling og affattes efter forskrifter givet af landsstyret. Den der erhverver bevis af højere grad, afleverer tidligere erhvervet bevis af lavere grad.

*Stk. 2.* det i § 10 omhandlede dueligheds bevis udstedes af den, for hvem duelighedsprøven er aflagt, medens øvrige beviser udstedes af landfogeden eller anden myndighed efter landsstyrets bestemmelse.

*Stk. 3.* Klage over en af de bevisudstedende myndigheder truffet beslutning rettes til landsstyret, hvis afgørelse kan indbringes for domstolene. Sagerne behandles ved søretten.

**§ 30.** Et sønæringsbevis kan fratages indehaveren, såfremt det på grund af indehaverens sjælelige eller legemlige tilstand af hensyn til det almene vel skønnes uforsvarligt vedblivende at lade den pågældende udøve de ham ved beviset tillagte rettigheder. Den pågældende skal opfordres til over for landsstyret at erklære, om han underkaster

avgerð ella ynskir málið avgjørt við dómi. Verður tílík váttan ikki givin innan 14 dagar, reikar landsstýrið fyri, at sakarmál verður reist móti honum eftir reglunum fyri borgarliga rættargongu.

*2. stk.* Eftir umsókn kann landsstýrið geva manni sjóvinnubræv aftur, sum tikið er frá honum, treytað av, at tær umstøður, ið grundaðu, at hann misti tað, ikki longur eru til. Gongur landsstýrið ikki umsóknini á møti, kann viðkomandi krevja avgerðina roynda við rættin, um so er, at í minsta lagi eitt ár er gingið eftir at endalig avgerð er tikin um at taka vinnubrævið frá honum og í minsta lagi eitt ár síðani tað við dómi er noktað honum at fáa vinnubrævið aftur. Tað er ein treyt fyri at fáa avgerðina roynda við rættin, at viðkomandi setir landsstýrinum krav um hetta áðrenn 3 vikur frá tí degi, hann við kunngerðing ella við innskrivaðum brævi er gjørdur kunnugur við avgerðina. Landsstýrið reikar fyri, at sakarmál verður reist móti honum eftir reglunum fyri borgarliga rættargongu. Sjórættarin viðger mál sum hesi.

*3. stk.* Tá ið hann, sum hevur sjóvinnubræv, hevur mist hetta við dómi ella rættindini, øll ella nøkur eftir tí eru týnd, skal vinnubrævið sum skjótast sendast landsstýrinum, sum so ger

sig denne afgørelse eller ønsker sagen afgjort ved dom. Afgives sådan erklæring ikke inden 14 dage, foranlediger landsstyret retssag anlagt mod den pågældende i den borgerlige retsplejes former.

*Stk. 2.* Landsstyret kan efter ansøgning tilbagegive en person et frataget sønæringsbevis, såfremt de omstændigheder, der har begrundet fratagelsen, ikke længere findes at være tilstede. Dersom landsstyret afslår ansøgningen, kan vedkommende begære denne afgørelse prøvet ved domstolene, hvis der er forløbet mindst et år, efter at der er truffet endelig bestemmelse om bevisets fratagelse, og mindst et år, efter at generhvervelsen senest er nægtet ham ved dom. Det er en betingelse for afgørelsens prøvelse ved domstolene, at den pågældende fremsætter begæring herom overfor landsstyret inden 3 uger fra det tidspunkt, da han ved forkyndelse eller anbefalet brev er blevet gjort bekendt med afgørelsen. Landsstyret foranlediger herefter retsag anlagt mod vedkommende i den borgerlige retsplejes former. Sager af den heromhandlede art behandles ved søretten.

*Stk. 3.* Når indehaveren af et sønæringsbevis ved dom fratages dette, eller de dertil knyttede rettigheder helt eller delvis for-

tey tiltøk, ið neyðug eru av hesum orsøkum.

**§ 31.** Missir skip í havn úr Føroyum nakran av fyrisettu manningini vegna sjúku, deyða, rýming ella aðrari orsøk, sum ikki kann roknast skipsføraranum ella reiðarinum til, skulu fyriskipanirnar eftir hesi lóg ikki vera til hindurs fyri, at skipsførarin heldur ferðina fram, um hann heldur hetta vera forsvarligt vegna sjótryggleika skipsins; manningin skal tó so skjótt sum gjørligt gerast fulltallig. Um hesi viðurskifti skal skibsførarin skriva tørvandi viðmerking í skipsdagbókina ella um skipsdagbók ikki er, so í tilsýnsbókina.

**§ 32.** Landsstýrið kann vegna fyriliggjandi umstøður gera frávik frá manningarreglunum í hesi lóg. Heraftrat kann landsstýrið vegna umstøðurnar loyva, at maður, ið ikki hevur sjóvinnubræv svarandi starvið, verður settur í hetta starv, tó bert fyri einstaka ferð ella ávíst tíðarskeið hægst 6 mánaðir.

*2. stk.* Undir serligum umstøðum kann landsstýrið loyva, at sjóvinnubræv verður givið, hóast treytirnar at fáa tílíkt vinnubræv ikki í øllum eru loknar. Undantak frá krøvunum at lúka

tabes, skal beviset snarest tilstilles landsstyret, der træffer de i den anledning fornødne foranstaltninger.

**§ 31.** Hvis et skib uden for færøsk havn mister nogen del af den foreskrevne besætning som følge af sygdom, død, rømning eller andre skibsføreren eller rederiet utilregnelige årsager, skal bestemmelserne i denne lov ikke være til hinder for, at skibsføreren under fornøden hensyntagen til skibets sødygtighed kan fortsætte rejsen; besætningen skal dog snarest gørligt kompletteres. Skibsføreren skal om forholdet indføre fornøden bemærkning i skibsdagbogen eller, hvor skibsdagbog ikke føres, i tilsynsbogen.

**§ 32.** Landsstyret kan under hensyn til foreliggende omstændigheder foretage afvigelser fra de i denne lov indeholdte bemandingsregler. Landsstyret kan endvidere under hensyn til de foreliggende omstændigheder tillade, at en person, der ikke er i besiddelse af det til den pågældende stilling svarende sønæringsbevis, anvendes i sådan stilling, dog kun for en enkelt rejse eller for et tidsrum af ikke over 6 måneder.

*Stk. 2.* Landsstyret kan under særlige omstændigheder tillade

treytirnar til próvtøku og sigling kunnu tó bert veitast, um viðkomandi verður hildin á annan hátt at hava fingið sær tørvandi lesnaligan og í virki tørvandi kunnleika.

*3. stk.* Fyri maskinmanning verða frávik og undantøk eftir 1. og 2. stk. givin eftir tilmæli frá Maskinmeistarafelagnum.

udstedelse af sønæringsbevis, uanset at de for erhvervelse af det pågældende bevis fastsatte betingelser ikke fuldt ud er opfyldt. Fritagelse for opfyldelse af eksamens- og fartskrav kan dog gives for så vidt den pågældende skønnes på anden måde at have forskaffet sig tilstrækkelig teoretisk og praktisk uddannelse.

*Stk. 3.* Vedrørende maskinbesætning kan afvigelser og dispensationer i henhold til stk. 1 og 2 meddeles efter indstilling fra maskinmesterforeningen.

**§ 33.** Tá ið føroyskt skip loysist ella kemur undir tollvald ella fer undir sigling er skylda hjá viðkomandi myndugleikum eftir teimum fyriskipanum, landsstýrið fyrisetir, at ansa eftir, at reglurnar í hesi lóg eru hildnar.

*2. stk.* Brot móti lógini og fyriskipanum, givnar eftir lógini verða sektað við bót. Málini eru undir sjórættinum.

**§ 33.** Når færøske skibe ud- og indklareres eller sættes i fart, påhviler det vedkommende myndigheder at påse overholdelsen af de i denne lov foreskrevne regler efter de anvisninger, som derom gives af landsstyret.

*Stk. 2.* Overtrædelser af denne lov eller de i dens medfør udstedte forskrifter straffes med bøde. Sagerne hører under søretten.

**Fyribils fyriskipanir.**

**Midlertidige bestemmelser.**

**§ 34.** Henda lóg fær gildi 1. juni 1984, tó so, at fyriskipanir eftir lógini í fyrsta lagi hava gildi fyri skipið, tá ið hetta fyrstu ferð, eftir at lógin er komin í gildi, siglir úr føroyskari havn ella red, tó ikki seinri enn 6 mánaðir eftir, at lógin er komin í

**§ 34.** Denne lov træder i kraft den 1. juni 1984, dog således, at de i loven indeholdte bestemmelser først finder anvendelse på det enkelte skib fra det tidspunkt, da det første gang efter lovens ikrafttræden afgår fra færøsk havn eller red, dog se-

gildi. Til lógin ella fyriskipanir hennara eru komnar í gildi fyri skipið, eru reglurnar higartil galdandi.
*2. stk.* Samstundis fer úr gildi lóg nr. 51 frá 25. juli 1966.

**§ 35.** Sjóvinnubrøv, fingin áðrenn henda lóg fær gildi, heimila innihavaranum sama rætt sum higartil, eins og lógin ger onga broyting í givnum undantaksloyvum.
*2. stk.* Landsstýrinum verður heimila at seta treytir, so innihavarar av sjóvinnubrøvum eftir 1. stk. fáa sama rætt sum innihavarar av vinnubrøvum eftir hesi lóg.
*3. stk.* Sjóvinnubrøv fingin eftir sjóvinnulógini frá 28. februar 1916 við seinri broytingum og manningarlógini frá 22. oktober 1954 við seinri broytingum verða hildin at svara til tey eftir hesi lóg tilskilaðu, sum her sagt frá:

nest 6 måneder efter lovens ikrafttræden. I tiden, indtil lovens bestemmelser kan træde i kraft for det enkelte skib, gælder de hidtidige bestemmelser.
*Stk. 2.* Samtidig ophæves lov nr. 51 af 25. juli 1966.

**§ 35.** De forinden ikrafttrædelsen af nærværende lov erhvervede sønæringsbeviser hjemler deres indehaver til, ligesom loven ikke gør ændring i meddelte dispensationer.
*Stk. 2.* Landsstyret bemyndiges til at fastsætte vilkår, hvorunder indehavere af sønæringsbeviser som de i det foregående stykke omhandlede opnår adgang til at erhverve lige ret med indehavere af de i nærværende lov omhandlede beviser.
*Stk. 3.* de i henhold til sønæringsloven af 28. februar 1916 med senere ændringer og bemandingsloven af 22. februar 1954 med senere ændringer erhvervede sønæringsbeviser anses at svare til de i nærværende lov omhandlede, som nedenfor angivet:

| Vinnubræv sum: | sama sum: | Bevis som: | svarer til: |
|---|---|---|---|
| Heimaskipari | heimaskipari | Kystskipper | kystskipper |
| Bestimaður | bestimaður | Bedstemand | bedstemand |
| Fiskiskipari á 1. stigi | skipari | Fiskeskipper af 1. grad | skipper |
| Skipari | skipari | Skipper | skipper |
| Skipsførari | skipsførari á 1. stigi | Skibsfører | skibsfører af 1. grad |
| Stýrimaður | stýrimaður á 1. stigi | Styrmand | styrmand af 1. grad |
| Maskinpassari | skipsmaskinistur | Maskinpasser | skibsmaskinist |
| Motorpassari | skipsmaskinistur | Motorpasser | skibsmaskinist |
| Undirmeistari | skipsmaskinmeistari á 2. stigi | Undermester | skibsmaskinmester af 2. grad |
| Maskinmeistari á 2. stgi | skipsmaskinmeistá 1. stigi | Makinmester af 2. klasse | skibsmaskinmester af 1. grad |
| Maskinmeistari á 1. stigi | skipsmaskinstjóri | Maskinmester af 1. klasse | skibsmaskinchef |

*4. stk.* Vinnubræv sum motorpassari gevur ikki rætt at inna tænastu á dampskipi undir viðurskiftum, har vinnubræv sum skipsmaskinistur krevst.

*Stk. 4.* Bevis som motorpasser giver ikke ret til at gøre tjeneste i dampskib under forhold, hvor bevis som skibsmaskinist kræves.

**§ 36.** Til árslok 1970 verða royndir eftir lógini um »navigationsundervisningen« frá 28. februar 1916 [illegible] um ella lóg frá 19. mars 1930 um »eksaminer for skibsmaskinister m.m.« javnmettar við royndir, sum eftir hesi lóg verða krevdar fyri at fáa sjóvinnubræv, sum her sagt frá:

§ 36. Indtil udgangen af året 1970 ligestilles eksaminer aflagt i henhold til lov om navigationsundervisningen af 28. februar 1916 [illegible] til lov af 9. marts 1970 om eksaminer for skibsmaskinister m.m. med de eksaminer, der i henhold til nærværende lov kræves til erhvervelse af det ovenfor sønæringsbevis som nedenfor angivet:

| | verður javnmett við: | | ligestilles med: |
|---|---|---|---|
| Heimaskipararoyndin | heimaskipara roynd | Kystskipperprøven | kystskipper-eksamen |
| Stýrimansroyndin | stýrimans-roynd | Styrmands-eksamen | styrmands-eksamen |
| Skipsførararoyndin | skipsførara-roynd | Skibsfører-eksamen | skibsfører-eksamen |
| Maskinpassararoyndin | maskinist-roynd | Maskinpasserprøven | maskinist-eksamen |
| Motorpassararoyndin | maskinist-roynd | Motorpasserprøven | maskinist-eksamen |
| Vanlig maskinistroynd | maskinmeistararoynd | Den almindelige maskinist-eksamen | maskinmester-eksamen |
| Størra maskinistroyndin | størru maskinmeistararoynd | Den udvidede maskinist-eksamen | udvidet maskinmestereksamen. |

*2. stk.* Hann, ið hevur staðið motorpassararoynd, kann bert fáa vinnubræv sum skipsmaskinistur, um hann kann prógva, at hann hevur verið í arbeiði í minsta lagi 24 mánaðir á smiðju- ella maskinverkstaði og heraftrat hevur arbeitt við motori í minsta lagi 3 mánaðir. Vinnubræv eftir hesum, sum skipsmaskinistur gevur bert rætt at inna tænastu á motorskipi.

*Stk. 2.* Den, der har bestået motorpasserprøven, vil dog kun kunne erhverve bevis som skibsmaskinist, såfremt han godtgør at have arbejdet mindst 24 måneder på et smede- eller maskinværksted samt at have deltaget i mindst 3 måneder i betjening af motor. Et i henhold til denne bestemmelse erhvervet bevis som skibsmskinist giver alene ret til at gøre tjeneste i motorskib.

1. viðgerð 26. apríl. Málið varð beint í lóganevndina, sum 9. mai legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av landsstýrinum 11. apríl 1984 og undir 1. viðgerð tann 26. í s.m. beint í lóganevndina.

Lóganevndin hevur viðgjørt málið, men við tað at hetta er eitt

stórt og rúgvusmikið mál, sær nevndin seg ikki føra fyri at avgreiða málið eftir so stutta tíð, og mælir nevndin til, at lóganevndin heldur fram sum millumtinganevnd hesum máli viðvíkjandi og setir sostatt fram

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Lóganevndin heldur fram sim millumtinganevnd til ólavsøkutingsetuna til viðgerð av løgtingsmáli nr. 137/1983: Løgtingslóg um manning av skipum.

2. viðgerð 9. mai. Uppskotið til samtyktar samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1600-3-3.

---

# 138. Altjóða sáttmáli um bjarging.

Formaðurin boðaði frá, at ríkisumboðið í skrivi til landsstýrið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at altjóða sáttmáli, dagfestur 27. apríl 1979, um leiting og bjarging á sjónum, verður lýstur at galda í Føroyum.

Malið varð beint í lóganevndina, sum 13. apríl 1984 legði fram soljóðandi

**Álit**

Landsstýrið hevur tann 15. mars 1984 skrivað løgtinginum soljóðandi:

»Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at

viðmerkja til, at altjóðasáttmáli, dagfestur 27. aprfl 1979, um leiting og bjarging á sjónum verður lýstur at galda í Føroyum.

Sáttmálin er p.t. ratifiseraður av fylgjandi londum: USA, Argentina, Canada, Chile, Vesturtýskalandi, Stóra Bretlandi, Fraklandi, Nederland, Noregi og Danmark.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við viðmæli.«

Sáttmálin fevnir um samarbeiði millum lond um bjarging av fólki, ið er komið í havsneyð. Av sáttmálanum, sum fylgir við hesum áliti, framgongur nærri, hvat samarbeiðið fevnir um.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Asbjørn Joensen, Agnar Nielsen og Arne Ziskasen) setir fram fylgjandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir, at altjóða sáttmáli frá 27. apríl 1979 um leiting og bjarging á sjónum verður lýstur at galda í Føroyum.

Minnilutin (Petur Reinert) kann taka undir við uppskotinum frá [illegible] nevnd av, at [illegible] og Bjargingartænastan hevur [illegible] av [illegible]

# 139. Norrønur sáttmáli um almannatrygd.

Ár 1984, fríggjadagin 13. apríl legði lóganevndin fram soljóðandi

**Álit**

Landsstýrið hevur tann 14. mars 1984 skrivað løgtinginum soljóðandi:

»Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at norrøni sáttmálin um almanna trygd, dagfestur 5. mars 1981, verður lýstur at galda í Føroyum.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við viðmæli.«

Lóganevndin hevur lagt spurningin fyri Almannastovuna til ummælis, og hevur Almannastovan mælt til, at sáttmálin verður settur í gildi í Føroyum. Upplýst verður, at tey av praktiskum orsøkum hava verið noydd at nýta nevnda sáttmála, og at tað er óhóskandi, at sáttmálin ikki formliga er settur í gildi.

Nevndin hevur viðgjørt málið og setir fram soljóðandi

uppskot

til

samtykt

Løgtingið samtykkir [illegible]
um almanna trygd verður sett[illegible]

2. viðgerð 27. apríl 1984. Uppskotið til samtyktar frá lóganevndini samtykt við 22-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1009-1-5.

# 140. Val av álitismonnum og nevndum.

Ár 1984, fríggjadagin 27. apríl var omanfyri nevnda mál framlagt.

9. mai varð málið avgreitt, sí bls. 9.

# 141. Viðvíkjandi stovnsetan av einum friðarráði.

Ár 1984, týsdagin 1. mai legði marknaðarnevndin fram soljóðandi

**Álit**

Jóhan Jacobsen, Oyrabakka, hevur sent løgtinginum skriv dagf. 8. apríl 1984 um stovnsetan av friðarráði.

Skrivið varð beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur á fundi tann 24. apríl 1984 viðgjørt málið, og heldur nevndin seg ikki kunna seta fram uppskot í málinum í hesi tingsetuni.

Álitið varð framlagt til kunningar og tikið til eftirtektar.

# 142. Umrøða av arbeiðsstøðuni hjá ungfólki í Føroyum.

7. mai 1984 legði sosiala nevndin fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram á ting av Tjóðveldisflokkinum hin 7. mars 1983. Tað var við 1. viðgerð hin 24. mars 1983 beint í sosialu nevndina.

Sosiala nevndin viðgjørdi ikki málið liðugt í seinastu tingsetu og varð tí samtykt at halda fram við viðgerðini í hesi tingsetu.

Á sumri 1982 var kanningin um arbeiðsstøðuna hjá ungfólki í Føroyum lokin og handað landsstýrinum.

Kanningin viðgerð tíðarskeiðið heystið 1981 og várið 1982. Kanniugarfólkini vóru ungfólk millum 16 og 20 ár.

Í 7 mánaða skeiðinum, har kanningin verður gjørd, arbeiða millum 200 og 300 fólk minni enn ein fjórðing av fullari arbeiðstíð. 160 fólk eru í hesi støðu bæði á heysti 1981 og á vári 1982. Av nevndu 160 fólkum eru 100 konufólk.

Eisini fingu vit at vita, at støðan versnaði frá heysti 1981 til várið 1982, og tað vóru tey yngstu í kanningarbólkinum, ið vóru ringast fyri. Víst var eisini á, at frægast er við arbeiði í sunnara parti av Eysturoynni, meðan vánaligast er í Norðoyggjum, á Sandoynni og í Suðuroy.

Tá uppskotið um kanning av arbeiðsstøðuni hjá teim ungu í Føroyum kom á tingborð, var sagt, at tað var við tí fyri eyga at útvega nýggj arbeiðspláss.

Kanningin hevur verið til umrøðu á tingi, og tykjast allir tingmenn at vera samdir um, at tað er sera óheppið, at ikki alt uppvaksandi ættarliðið er í vinnu.

Til tess at seta arbeiðsskapandi tiltøk í verk er vert at hyggja eftir verandi arbeiðsplássum.

Tey flestu hava vit á sjónum, og flestøll skip fáa á onkran hátt stuðul frá tí almenna. Manningartalið er aloftast sera lágt sett, og pláss er fyri fleiri fólkum umborð.

Júst tí vit ikki hava nakran fiskivinnuskúla í Føroyum, er tað gagnligt at geva ungfólki, bæði gentum og dreingjum, høvi til at kunna seg við arbeiði umborð á skipunum.

Sosiala nevndin heitir tí á Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið um við komandi sáttmálasamráðingar at gera avtalu um setan av ungum fólki um borð á skipini.

Fyri stuttum kom fram, at vit gjalda 140 mió. kr. árliga fyri umvæling av skipum uttanlands. Eyðsýnt er, at vit her kundu skapt nógv nýggj arbeiðspláss í landinum fyri henda pening.

Á hvønn bógvin nýggju arbeiðsplássini skulu benda, kann vísast til ársfrágreiðing Ídnaðarstovunnar í 1981.

Vert er annars at leggja dent á, at tey, ið ikki eru heilsuliga fullfør, koma at hava serliga ilt við at fáa eitt arbeiði, tá torført er hjá teim fullføru at fáa arbeiði. Sosiala nevndin minnir her á løgtingssamtyktina um, at brekað skulu hava serrætt til arbeiði á almennum og hálvalmennum arbeiðsplássum. Eftir samtyktini skuldi landsstýrið gera eina reglugerð, men hon er ongantíð komin. Nevndin minnir tí landsstýrið á hesa reglugerð.

Tann kanning, vit hava havt at arbeiða við viðvikjandi arbeiðsstøðuni hjá teimum ungu var frá 1981/82. Við tað at eingin arbeiðsloysisskráseting fer fram í Føroyum, vita vit ikki, hvussu støðan er nú.

Hin 24. mars 1983 samtykti tingið, at spurningurin um arbeiðsávísing og arbeiðsloysisstuðul skuldi beinast til [illegible] stýrinum. Hóast hesa samtykt, [illegible] skrivi løgtinginum frá, at [illegible] av, at tað fyrstu tíðina ikk[illegible] undir neyðugu kanningararbeiðnir.

— — —

Sosiala nevndin metir, at málið viðvikjandi arbeiðsstøðuni hjá ungu fólki er so álvarsamt, at tað ikki kann bíða í óásetta tíð.

Í tráð við hetta verður mælt til, at fólkaskúlin fær lítið upp í hendur at kanna, hvar næmingarnir eru eitt ár aftaná, at skúlin er lokin. Hvør einstakur skúli hevur allar upplýsingar framman undan

um næmingin og kennir umstøðurnar, og hugsast kann, at tað ikki fellur næminginum fyri bróstið, at skúlin vendir sær til hansara eitt ár aftaná, at skúlatíðin er av til tess at fáa uppspurt, hvat hann hevur tikist við fyrsta árið eftir, at farið var úr skúlanum. Henda skipan kann hóskandi virka so leingi, eingin arbeiðsloysisskráseting finst í landinum.

Frammanfyri nevndu viðmerkingar eru frá allari nevndini. Harumframt setir ein minniluti (Karin Kjølbro og Jóannes Dalsgaard) fram soljóðandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Landsstýrið áleggur fólkaskúlanum at kanna eftir, hvar næmingurin er eitt ár aftaná, at hann er farin úr skúlanum.

2. viðgerð 8. mai. Uppskotið fall við 13-0 atkvøðum.

---

# 143. Uppskot um bókaforlag (93/82).

4. mai legði sosiala nevndin fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram á ting av Javnaðarflokkinum hin 23. mars 1983 og hevði tá nr. 93/1982.

Í seinastu tingsetu varð málið viðgjørt í sosialu nevnd, men av tí, at nevndin ikki helt seg hava viðgjørt málið til fulnar, skeyt hon upp, at málið varð viðgjørt í tingsetuni 1983.

Í seinastu tingsetu hevði nevndin fund við umboð fyri Rithøvundafelag Føroya, sum framførdu teirra sjónarmið.

Eisini hevur umboð fyri sosialu nevndina talað við formannin í Mentunnargrunni Føroya Løgtings og viðgjørt spurningin um møguleikarnar fyri føroyskari bókaútgávu.

Niðurstøðan hjá einum meiriluta av sosialu nevndini er, at heldur enn at seta á stovn eitt nýtt alment bókaforlag, eiga møguleikarnir hjá Mentunnargrunninum at rúmkast.

Mentunnargrunnurin hevur partvís peving at lata sum studning til rithøvundar og forløg og partvís pening í lánsgrunn, sum kann veitast. Á verandi fíggjarlóg eru avsettar kr. 300.000 til Mentunnargrunnin og kr. 100.000 til Lánsgrunnin.

Nevndin heldur, at reglugerðin hjá Mentunnargrunninum og Lánsgrunninum eigur at verða broytt eftir hesum sjónarmiðum:

1) Mentunnargrunnurin kann veita studning til rithøvundar og forløg í samband við bókaútgávu svarandi til um leið tvær vanligar mánaðarlønir fyri eina vanliga bók upp á um leið 200 síður.
2) Til útgávu av bókum kann Lánsgrunnurin veita lán upp til 80% av útgávukostnaðinum fyri bókina.
3) Rentan fyri nevnda lán verður 5% p.a. Avdráttartíðin verður 5 ár, harav fyrsta árið avdráttarfrítt.

Út frá hesum setir nevndin í staðin fyri uppskot Javnaðarfloksins fram hetta

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir, at frá og við fíggjarárinum 1985/86 og til nýggj samtykt verður gjørd, verða í mintsta lagi avsettar á fíggjarlógina kr. 400.000 til Mentunnargrunn Føroya Løgtings, herav kr. 100.000 til stovnsfæið, og kr. 500.000 til lánsgrunnin.

Landsstýrinum verður álagt at broyta reglugerðina fyri Mentunnargrunnin og lánsgrunnin í samsvar við punktini 1) til 3) í frammanfyristandandi viðmerkingum.

2. viðgerð 8. mai. Uppskotið frá nevndini samtykt við 25-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 2211-5.

# 144. Vegir og lendingar.

8. mai legði vega- og havnanevndin fram soljóðandi

**Álit**

Havna- og veganevndin hevur viðgjørt tær o.u. 200 umsóknirnar, sum innkomnar eru.

**I. Vegir**

Á fíggjarløgtingslógini eru settar av undir gr. 13.1. 125,7 mió. kr. til vegagerðir, umsiting av landsvegum o.a.

Viðvíkjandi nýtsluni av hesum peningi skal nevndin loyva sær at seta fram soljóðandi

**Uppskot**

| | |
|---|---|
| Til útbygging av og ábøtur á landsvegakervini og umsiting teirra; | |
| harumframt til brýr, bilferjur o.a. | 107.137.100 kr. |
| Bundið í ikki nýttum játtanum o.u. | 10.931.650 - |
| Til niðanfyri nevndu vegagerðir | 7.706.250 - |
| | 125.775.000 kr. |

| kommuna | til | Studningur 3/4 av kr. |
|---|---|---|
| Fugloyar | ábøtur á bygdavegirnar á kirkju og í Hattarvík ..... | 100.000 |
| Svínoyar | umvæling av vegnum eystur í hagan .. | 100.000 |
| | framhald av vegnum í Handantúnstriðingi ..... | 100.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Viðareiðis | ábøtur og asfaltering av vegnum Inn í Dalar ..... | 100.000 |
| | dyrkingarveg Eystur við Egg ..... | 50.000 |
| | breiðking av Dalavegnum Inni í Leiti . | 100.000 |
| | dyrkingarveg Inni í Dølum ..... | 50.000 |
| Hvannasunds | útstykkingarveg í Hvannasundi ..... | 50.000 |
| | útstykkingarveg í Norðdepli ..... | 50.000 |
| | dyrkingarvegir í Hvannasundi ..... | 50.000 |
| | dyrkingarvegir í Norðdepli ..... | 50.000 |
| Klaksvíkar | dyrkingarveg í Árnafirði ..... | 200.000 |
| | veg út í Torvadal ..... | 200.000 |
| Kunoyar | veg í Kunoyar bygd ..... | 100.000 |
| | dyrkingarveg suðuri á Keldu ..... | 100.000 |
| Mikladals | veg í Mikladali ..... | 200.000 |
| Elduvíkar | útstykkingarvegir í Elduvík ..... | 100.000 |
| | útstykkingarvegir í Funningsf. ..... | 100.000 |
| Oyndarfjarðar | útstykkingarvegur ..... | 200.000 |
| Fuglafjarðar | niðurgongdina av Hálsi niður í Góðadal ..... | 50.000 |
| | veg í Rossagerði ..... | 150.000 |
| | veg til ídnaðar- og sethúsaøki á Kambsdali ..... | 100.000 |
| | veg til smoltstøð millum Hellurnar og Oyndarfjørð ..... | 100.000 |
| Leirvíkar | nýgerð av bygdavegi norðast í bygdini | 150.000 |
| | vegin sunnast í bygdini ..... | 150.000 |
| Gøtu | veg úr Syðrugøtu ..... | 100.000 |
| | dyrkingarveg Norður millum Fjarða | 100.000 |
| | dyrkingarveg við Gøtugjógv ..... | 100.000 |
| Runavíkar | íbindingar í Søldarfirði ..... | 150.000 |
| | vegin út á Glyvradal ..... | 150.000 |

| | | |
|---|---|---|
| | vegin oman á Kópasker ..... | 100.000 |
| Nes | vegin millum Nes og Toftir ..... | 100.000 |
| | veg inni í Saltnesi ..... | 100.000 |
| | útstykkingarveg á Toftum ..... | 100.000 |
| | veg úti á Nesi ..... | 100.000 |
| Skála | búsctingarveg Úti á Fløtum ..... | 100.000 |
| | búsetingarveg í Sjóvartúni ..... | 100.000 |
| | veg í Skálafirði ..... | 100.000 |
| Sjóvar | veg frá Blásenda á Selatrað ..... | 50.000 |
| | útstykkingarveg í Eyrgøtu á Str. .... | 100.000 |
| | útstykkingarveg Innan Glyvur ..... | 100.000 |
| | veg til bygdarhúsið á Strondum .... | 100.000 |
| Sunda | útstykkingarveg við Norðskála ..... | 100.000 |
| | útstykkingarvegir á Oyrabakka .... | 75.000 |
| | húsaveg á Oyri ..... | 75.000 |
| Eiðis | veg úti á Bø v.f. bygdina ..... | 75.000 |
| | bústaðarveg við Ljósá ..... | 50.000 |
| | bústaðarveg í Svínáum ..... | 50.000 |
| | veg á Kollshjøllum/Meinufløtu .... | 100.000 |
| Funnings | vegir og brúgv í Funningi ..... | 150.000 |
| Haldarsvíkar | kirkjugarðsvegin í Tjørnuv. ..... | 100.000 |
| | veg og park.pláss til neystaøki ..... | 100.000 |
| | útstykkingarveg á Langasandi ..... | 75.000 |
| Hvalvíkar | útstykkingarveg ..... | 200.000 |
| Kvívíkar | útstykkingarveg frammi í Gerði .... | 150.000 |
| Vestmanna | ovara veg, Gerðisheyggi ..... | 150.000 |
| | veg í Miðalsbrekku og »Báðumegin Hórará« ..... | 200.000 |
| Tórsh. Uttanb. | dyrkingarveg í Norðadali ..... | 50.000 |
| | dyrkingarveg í Syðradali ..... | 50.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Kirkjubøar | útstykkingarvegir í Kirkjubø ..... | 100.000 |
| | dyrkingar veg út á Bø ..... | 100.000 |
| Sandavágs | vegir í bygdini ..... | 300.000 |
| Miðvágs | vegin í Tíkarheygg ..... | 200.000 |
| | vegin Inni í Húsi ..... | 200.000 |
| Sørvágs | vegin gjøgnum Suðurtriðingsbøin .. | 100.000 |
| | vegin frá »Blindtarminum« í Bíggjarv. | 200.000 |
| Bíggjar | veg í bygdini ..... | 50.000 |
| | veg í Gásadali ..... | 50.000 |
| Skopunar | útstykkingarv. norðuri í Gerðinum . | 100.000 |
| | veg oman á Berg (Harðabergsláinna) | 200.000 |
| Sands | veg og brýr í Trøðum ..... | 300.000 |
| Skálavíkar | veg inn í Dalatrøðna ..... | 100.000 |
| | veg til Heimastahagarættina ..... | 75.000 |
| Húsavíkar | brúgv um Stórá (Húsavík) ..... | 75.000 |
| | veg niðan í Gerðið í Dali ..... | 50.000 |
| | veg inn á Langagarð í Húsav. ..... | 50.000 |
| Hvalbiar | dyrkingarveg í Sandvík ..... | 100.000 |
| | veg í Nesi í Hvalba ..... | 75.000 |
| | veg til bústaðarøki í Hvalba ..... | 100.000 |
| Tvøroyrar | útstykkingarv. á Ahlén-økinum .... | 100.000 |
| | gerð av vegi í Støklarnar ..... | 100.000 |
| | gerð av Rangabotnsvegnum ..... | 100.000 |
| Hovs | veg omanf. skúlaspæliplássið ..... | 150.000 |
| | veg oman til Tjaldavík ..... | 100.000 |
| Porkeris | vegin út á Grávíkshellur ..... | 100.000 |
| | vegin vestur á Brekkur ..... | 75.000 |
| | vegin oman í Grøna Dal ..... | 100.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Vágs | Fámarávegin ..... | 100.000 |
| | dyrkingarveg inni á Bakka ..... | 150.000 |
| | dyrkingarveg millum Toftá og Hvandalsá ..... | 75.000 |
| Sunnbiar | veg í Uttarabø í Lopra ..... | 100.000 |
| | dyrkingarveg »Eystur undir Egginí« .. | 50.000 |
| | veg til Hamrabyrgi í Víkarbyrgi .... | 100.000 |
| | veg til grundøki í Sunnba ..... | 100.000 |
| Tórshavnar | veg í Kaldbaksbotni vestan fyri ánna | 50.000 |
| | tilsamans | 10.275.000 |
| | 3/4 av | 7.706.250 |

**II. Lendingar:**

Játtanir fyri fíggjarárið 1984/85, sum samtyktar eru áður, eru hesar:

| **Kommuna** | **til** | **Studningur 3/4 av kr.** |
|---|---|---|
| Hvannasunds | Bátahavn n.f. byrgingina, leinging av bryggjuni við flakavirkið í Norðdepli og gerð av havnaøki Hvannasunds-megin (Viðareiðis og Hvannasunds kommunur í felag) | |
| | (5. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð ... | 400.000 |
| | Gerð av garði og atløgubrúgv í Sandoyrarbugi, brimgarði í Norðdepli, grótkasti út úr Todnesi, leingjan av kaiumi í Norðdepli | |
| | (3. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð ... | 600.000 |
| | Bátahyl s.f. Todnes (Viðareiðis og Hvannasunds kommunur í felag) | |
| | (2. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð ... | 200.000 |
| | Atkomuveg og planering av havnaøki á Norðtoftum | |
| | (2. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð ... | 200.000 |
| | Planering av øki fyri egningarskúrum | |
| | (2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt .... | 100.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Klaksvíkar | 2. byggistig í dekksbátahavnini í Árnafirði og regulering av betonglegging við flakavirkið á Kósini<br>(5. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð ... | 400.000 |
| | Bátahyl í Borðoyavík<br>(2. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt .. | 400.000 |
| | Leiðings- og áleggingararbeiði á Stongunum<br>(2. ársgjald av 2 ára játtan) í gerð ... | 130.000 |
| Kunoyar | Grótkast undir kirkjugarðinum<br>(2. ársgjald av 3 ára játtan) ikki bygt . | 50.000 |
| Elduvíkar | Bátahyl í Funningsfirði<br>(4. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð ... | 200.000 |
| | Bátahyl í Funningsfirði<br>(4. ársgjald av 5. ára játtan í gerð ... | 150.000 |
| | Bátadrátt í Elduvík<br>(2. ársgjald av 2 ára játtan) í gerð ... | 50.000 |
| | Útbygging av havnalagnum og gerð av bátahyli í Funningsfirði<br>(3. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð ... | 150.000 |
| Oyndarfjarðar | Veg o.a. í sambandi við dekksbátahavn í Oyndarfirði<br>(5. ársgjald av 6 ára játtan) bygt | 400.000 |
| | Dekksbátahavn<br>(4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt .... | 800.000 |
| | Dekksbátahavn í Oyndarfirði<br>(3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt .... | 500.000 |
| | Veg til dekksbátahavn og til grótbrotið<br>(2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt .... | 600.000 |
| Fuglafjarðar | Dekksbátahavn<br>(5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt .... | 300.000 |
| | Smábátahavn<br>(3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt .... | 100.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Gøtu | Dýping, reguleringsarbeiði og elarbeiði (4. ársgjald av 3 ára játtan) bygt .... | 500.000 |
| Runavíkar | 50 m atløgubryggju í Søldarfirði (5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt .... | 300.000 |
| | Ábøtur, víðkan av oljubryggjuni í Søldarfirði (4. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt . | 150.000 |
| | Bátahyl í Líknargøtu í Saltangará (3. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt .. | 200.000 |
| | Ábøtur á lendingina í Rituvík (3. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð ... | 100.000 |
| | Ábøtur á lendingina á Gomlustøð í Lamba, t.e. víðkan á bátadráttinum av pierinum (3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt .... | 150.000 |
| | Meirkostnað av bryggjuni í Søldarfirði og veg til hana (3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt .... | 250.000 |
| | Leiding í Lamba (2. ársgjald av 3 ára játtan) bygt .... | 300.000 |
| | Lendingin í Rituvík (2. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð .. | 50.000 |
| | Ábøtur á lendingina í Æðuvík (2. ársgjald av 2 ára játtan) í gerð ... | 50.000 |
| | Bátahyl í Líkningargøtu (2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt . | 100.000 |
| | Bryggjuna á Bakka á Glyvrum 2. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð .... | 150.000 |
| Nes | Grótkast s.f. ferjuleguna á Toftum (5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt .... | 400.000 |
| | Bátahyl í Oyrunum á Toftum (2. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt . | 200.000 |
| Skála | Bátahyl í Skálafirði (3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt . | 150.000 |
| Sjóvar | Byggiøki, ferjulega, o. a. við Heygsstøð | |

| | | |
|---|---|---|
| | (5. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt . | 600.000 |
| | Bátahyl á Selatræ<br>(2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt .... | 50.000 |
| | Pier í Kolbeinagjógv<br>(2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt . | 50.000 |
| Sunda | Planering fyri nýggjum Skeljavirki<br>(4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... | 100.000 |
| | Grótkast á Oyri og víðkan um havnaøkir á Oyri<br>(3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt .... | 200.000 |
| | Lendibrúnna á Norðskála<br>(3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt .... | 100.000 |
| | Grótkast á Oyri<br>2. ársgjald av 3 ára játtan) ..... | 150.000 |
| | Lendingina við Norðskála<br>(2. ársgjald av 4 ára játtan) bygt .... | 150.000 |
| | Økið undir Skeljavirkinum og byggibúning<br>(2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt .... | 50.000 |
| Eiðis | Byggiøki við havnina o.a.<br>(5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt .... | 800.000 |
| | Bátahavn<br>(4. ársgjald av 6 ára játtan) bygt .... | 800.000 |
| | Bátahylin við Ljósá<br>(2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt .... | 100.000 |
| | Atløguplass til útróðrabátar á Eiði<br>(2. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt .. | 150.000 |
| Funnings | Lendingina<br>(2. ársgjald av 2 ára játtan) á gerð .. | 75.000 |
| Hvalvíkar | Útbygging av bryggjuni í Hvalvík<br>(3. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt . | 600.000 |
| | Dekksbátahavn<br>(2. ársgjald av 4 ára játtan) bygt ..... | 50.000 |
| Hósvíkar | Bátahylin<br>(2. ársgjald av 3 ára játtan) bygt .... | 50.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Kollafjarðar | Bátahavnina við Sjógv<br>(2. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð ... | 100.000 |
| Kvívíkar | Bátahavnina í Kvívík<br>(3. ársgjald av 7 ára játtan) bygd ... | 600.000 |
| | Bátahylin í Kvívík<br>2. ársgjald av 4 ára játtan) bygt ..... | 400.000 |
| Vestmanna | Bátalegur innanfyri Grønanes og monteringsbryggju við Skipasmiðjuna<br>(5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt .... | 600.000 |
| | Bátahyl inni á Fjørð<br>(3. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt . | 200.000 |
| Tórsh. uttanb.: | Bátahavn á Argjum<br>(5. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð .... | 600.000 |
| Kirkjubøar | Lendingin á Velbastað<br>(4. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð ... | 100.000 |
| | Lendingina á Velbastað<br>(2. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð ... | 250.000 |
| Hests | Dekksbátahavn í Hesti<br>(5. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt . | 800.000 |
| Nólsoyar | 50 m atløgusíðu<br>(5. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð ... | 400.000 |
| Sandavágs | Til portur ella til í aðra máta at kyrra bátahylin í Sandavági<br>(3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt .. | 250.000 |
| | Vegin oman á havnarøkið við Giljanes<br>(2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt .... | 300.000 |
| | Verju av bátahyli og bátahyl í Sandavági<br>(2. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt .. | 700.000 |
| Miðvágs | Brimgarð á Prestlandinum<br>(5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt .... | 600.000 |
| | Bátahylin og veg á Prestlandinum<br>(4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt .... | 175.000 |
| | Atløgupláss á Prestlandinum<br>(2. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt .. | 600.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Sørvágs | Atløgupláss í bátahavnini<br>(5. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð .... | 150.000 |
| | Bátahylin<br>(2. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð ... | 150.000 |
| | Vitan á Múlanum<br>(2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt .... | 35.000 |
| | Radarrefleks og mastur á Skerhólmi<br>(2. ársgjald av 2 ára játtan) á gerð .. | 50.000 |
| Sands | Regulering av øki í samnandi við fiskiídnaðarbygging og onnur arbeiði við havnalagið á Sandi<br>5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... | 600.000 |
| | Havnavíðkanina<br>(4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt .... | 300.000 |
| | Havnina<br>(3. ársgjald av 6 ára játtan) bygt .... | 600.000 |
| | Veg til ferjuleguna<br>(2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt . | 250.000 |
| Skopunar | Brúgvagerð um Stórá<br>(3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt .... | 150.000 |
| Húsavíkar | Molan á Skarvaskeri<br>(2. ársgjald av 4 ára játtan ikki bygt .. | 150.000 |
| Skúvoyar | Vegin av lendingini upp á bakkan<br>(3. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð ... | 200.000 |
| Hvalbiar | Arbeiði í sambandi við fiskiídnaðarbygging við Hamranes<br>(5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt .... | 600.000 |
| | Ábøtur á havnina í Nesi og atløgubryggju í bátahylinum í Nesi<br>(2. ársgjald av 6 ára játtan ikki bygt .. | 50.000 |
| | Umvæling av Skálamøl (lending.)<br>(2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt .... | 60.000 |
| Tvøroyrar | Bátahylin undir Tvørábakka<br>(2. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð ... | 100.000 |

| | | |
|---|---|---|
| | Umvæling av bátadrátti á Mølini í Froðba<br>(2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt . | 50.000 |
| Fámjins | Lendingina<br>(4. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt . | 100.000 |
| Hovs | Partur ella grótkast og teymar<br>(2. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð ... | 75.000 |
| Vágs | Bátahyl<br>(3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt .... | 200.000 |
| | Ábøtur á lendingina á Nesi<br>(2. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt . | 50.000 |
| Sunnbiar | Grótkastið í Lopra<br>(3. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt .. | 200.000 |
| | Bátahyl í Pallinum<br>(3. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt .. | 200.000 |
| | Verju undir Bakkanum og á Mølini<br>(2. ársgjald av 4 ára játtan í gerð ..... | 250.000 |
| | Grótkastið í Lopra<br>(2. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt .. | 300.000 |
| Tórshavnar | Bátahavnina<br>(2. ársgjald av 4 ára játtan) bygt .... | 500.000 |
| | Tilsamans 3/4 av | 24.900.000 |
| | | = 18.675.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Játtað frammanundan fyri 1984/85 til lendingar | | 18.675.000 kr. |
| Ikki nýttar gjaldkomnar játtanir pr. 31.03.1984 | | 22.164.447 kr. |
| | | 40.839.447 kr. |
| Av játtanum fyri 1984/85 v.m. er goldið ..... | | 7.650.000 kr. |
| | | 33.189.447 kr. |
| Í grunni pr. 01.04.1984 | 18.336.129 kr. | |
| Játtað 1984/85 | 19.000.000 kr. | 37.336.129 kr. |
| til góðar | | 4.146.682 kr. |

Viðvíkjandi nýjáttanum skal nevndin loyva sær at seta fram soljóðandi

**Uppskot**

| **Kommuna** | **til** | **Studniugur 3/4 av kr.** |
|---|---|---|
| Fugloyar | lendingina á Trøllagjógv í Hattarvík<br>3/4 av 100.000 kr./árið í 2 ár ..... | 100.000 |
| | vegin niðan frá lendingini á Skorðagjógv á Kirkju<br>3/4 av 100.000 kr./árið í 4 ár ..... | 100.000 |
| Svinoyar | verjugarð fyri bakkan í Víkini<br>3/4 av 200.000 kr./árið í 2 ár ..... | 200.000 |
| Kunoyar | niðankoyring av lendingini í Haraldsundi<br>3/4 av 150.000 kr. í 1 ár ..... | 150.000 |
| Húsa- og Mikladals | smábáta havn í Knúksdali, til kanningar<br>3/4 av 100.000 kr./árið í 3 ár ..... | 100.000 |
| Elduvíkar | bátadráttin í Elduvík<br>3/4 av 150.000 kr./árið í 2 ár ..... | 150.000 |
| Gøtu | bátahylin undir Gøtueiði<br>3/4 av 200.000 kr./árið í 2 ár ..... | 200.000 |
| Runavíkar | drátt á Gomlustøð í Lamba<br>3/4 av 100.000 kr./árið í 2 ár ..... | 100.000 |
| | hylin og dráttin í Rituvík<br>3/4 av 100.000 kr./árið í 4 ár ..... | 100.000 |
| | lending í Æðuvík<br>3/4 av 100.000 kr. í 1 ár ..... | 100.000 |
| Skála | bátahylin<br>3/4 av 200.000 kr./árið í 2 ár ..... | 200.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Sjóvar | bátahylin á Selatrað<br>3/4 av 50.000 kr./árið í 2 ár ..... | 50.000 |
| | pier í Kolbeinagjógv<br>3/4 av 50.000 kr./árið í 2 ár ..... | 50.000 |
| Sunda | frárenning við bátahylin á Oyrabakka og atløgusíðu í bátah. á Oyrabakka<br>3/4 av 150.000 kr./árið í 3 ár ..... | 150.000 |
| | lendibrúnna við Norðskála<br>3/4 av 150.000 kr./árið í 2 ár ..... | 150.000 |
| Funnings | ábøtur á lendingina<br>3/4 av 100.000 kr. í 1 ár ..... | 100.000 |
| Funningsf. Elduvíkar | bátahylin í Funningsfirði<br>3/4 av 300.000 kr./árið í 5 ár ..... | 300.000 |
| Kvívíkar | bátahavnina<br>3/4 av 300.000 kr./árið í 5 ár ..... | 300.000 |
| Hests | veg niðan á bakkan í Koltri<br>3/4 av 300.000 kr./árið í 2 ár ..... | 300.000 |
| Nólsoyar | útbygging av havnarlagnum<br>3/4 av 300.000 kr./árið í 4 ár ..... | 300.000 |
| Sandavágs | modelroyndir av bátahylinum<br>3/4 av 150.000 kr./árið í 3 ár ..... | 150.000 |
| Sørvágs | bátahylin<br>3/4 av 250.000 kr./árið í 5 ár ..... | 250.000 |
| Húsavíkar | lendingina Skarvasker í Húsavík<br>3/4 av 300.000 kr./árið í 5 ár ..... | 300.000 |
| Skúvoyar | lendingarvegin<br>3/4 av 200.000 kr./árið í 2 ár ..... | 200.000 |
| Hvalbiar | ábøtur á havnaviðursk. á Nesi<br>3/4 av 250.000 kr./árið í 5 ár ..... | 250.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Tvøroyrar | bátahylin undir Tvørábakka | |
| | 3/4 av 200.000 kr./árið í 4 ár ..... | 200.000 |
| | bátahylin í Trongisvági | |
| | 3/4 av 100.000 kr. í 1 ár ..... | 100.000 |
| Fámjins | lending og brimverju | |
| | 3/4 av 100.000 kr./árið í 4 ár ..... | 100.000 |
| Hovs | havnaportur og hækking og leinging av brimgarði | |
| | 3/4 av 450.000 kr./árið í 4 ár ..... | 450.000 |
| Sunnbiar | bátahyl í Sumba ..... | |
| | 3/4 av 400.000 kr./árið í 6 ár ..... | 400.000 |
| | planering av havnarøkinum v.f. Sagverksbyggningin í Lopra | |
| | 3/4 av 150.000 kr./árið í 2 ár ..... | 150.000 |
| Tórshavnar | havnarøki við Týggjará í Kaldbaksfirði | |
| | 3/4 av 150.000 kr./árið í 3 ár ..... | 150.000 |
| | tilsamans | 5.900.000 |
| | 3/4 = | 4.425.000 |

2. viðgerð 8. mai. Uppskot I: Vegir samtykt við 21-0 og II: Lendingar samtykt við 22-0.

# 145. Navnalóggávan.

8. mai legði lóganevndin fram soljóðandi

**Álit**

Eftir uppskoti frá Sjálvstýrisflokkinum til samtyktar í tingmáli nr. 47/1976, setti løgtingið eina 3-manna uttantinganevnd.

Setningurin hjá nevndini var at seta fram uppskot um fornøvn, eftirnøvn, stavseting av nøvnum, skráseting av nøvnum og fasta nevnd at taka støðu til ivaspurningar nøvnum viðvíkjandi.

Í nevndina valdi løgtingið Theodor Hansen, Jóan Hendrik Winther Poulsen og Petur Martin Rasmussen.

Nevndin hevur nú handað landsstýrinum álit við uppskotið til løgtingslóg um fólkanøvn. Landsstýrið hevur sent álitið víðari til løgtingið, tá tað var løgtingið, ið hevði sett nevndina.

Í álitinum er sett fram uppskot um eina serliga føroyska lóg um fólkanøvn.

Eftir heimastýrislógini er navnalóggáva hvørki A- ella B-mál og navnalóggávuøkið kann sostatt ikki yvirtakast uttan at heimastýrislógin verður broytt.

Víst verður annars til viðlagda skriv dagfest 3. mai 1984 við skjali frá ríkisumboðnum.

Nevndin hevur viðgjørt málið og setir fram fylgjandi

**uppskot**
**til**
**samtyktar**

Álitið um føroyska fólkanavnalóg verður sent landsstýrinum og og álagt verður landsstýrinum at fyrireika nýggja lóggávu á økinum.

*Sí skjal 16.*

2. viðgerð 8. mai. Uppskotið varð samtykt við 18-0 atkvøðum.

# 100-1. Viðvíkjandi støðunum á Sornfelli/í Mjørkadali og støðini á Eiði.

Ár 1983, mánadagin 1. august boðaði formaðurin frá soljóðandi

**fyrispurningi**
**til**
**ríkisumboðsmannin.**

Vil ríkisumboðsmaðurin greitt upplýsa fyri Føroya Løgtingi:

1. Hvørjar útbyggingar ella útskiftingar eru ætlaðar at fara fram á støðini í Mjørkadali/á Sornfelli?

2. Merkja hesar ætlanir, at danska stjórnin og Nato ikki ætla at virða og akta tær samtyktir, sum Føroya Løgting hevur gjørt í 1960 og 1970 um hermenn og hernaðarútgerð á føroyskum lands- og sjóøki?

**Viðmerkingar:**

Sum kunnugt eru støðirnar á Sornfelli/í Mjørkadali og støðin á Eiði í stríð við samtyktir gjørdar á Føroya løgtingi 1960 (Tingmál nr. 78/1968 — Løgtingstíðindi 1970). Nógvir føroyingar hava ampa av, at ríkisstjórnin ikki higartil hevur virt hesar tingsamtyktir okkara. Somuleiðis hava nógvir av okkara landsmonnum ein ótta á sær, so leingi hesar støðir eru í landinum, tí tað gerst alt meiri týðiligt, at tær hava alstóran týdning í einum møguligum hernaðarligum samanbresti milum Nato og Warzawasamgonguna. Samstundis er tað greitt, at støðirnar ongan týdning hava fyri verjuna av sjálvum Føroyum

— tvørturímóti eru støðirnar eftir øllum at døma ein stórur vandi fyri tað fólk, sum her býr, ífall kríggj brestur á.

Nú hevur so verjuleiðslan boðað frá, at ætlan er at gera ávísar broytingar ella íbøtur ella útbyggingar á støðini á Sornfelli og í Mjørkadali. Hetta má, tá løgtingssamtyktirnar verða havdar í huga, tykjast monguni føroyingum og dønum marghátttligt.

Fyri at fáa greiði á hesum máli. loyvi eg mær at seta ríkisumboðsmanninum hendan fyrispurning.

3. august varð við 30-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

31. oktober svaraði ríkisumboðsmaðurin fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Forespørgselen var sålydende:

»Vil ríkisumboðsmaðurin greitt upplýsa fyri Føroya Løgtingi:

1. Hvørjar útbyggingar ella útskiftingar eru ætlaðar at fara fram á støðini í Mjørkadali/á Sornfelli?

2. Merkja hesar ætlanir, at danska stjórnin og Nato ikki ætla at virða og akta tær samtyktir, sum Føroya Løgting hevur gjørt í 1960 og 1970 um hermenn og hernaðarútgerð á føroyskum lands- og sjóøki?«

Til den første del af spørgsmålet skal jeg oplyse, at der ikke foregår nogen udbygning af flyvestation Tórshavn. Der er alene tale om en udskiftning af udslidt og forældet materiel fra stationens opførelse i begyndelsen af 60'erne til mere driftsikkert og tidssvarende materiel. En modernisering som iøvrigt må ses i sammenhæng med moderniseringen af tilsvarende britiske anlæg, idet det er væsentligt, at anlæggene kan virke sammen. Der er således ikke tale om nye planer i forhold til, hvad der blev meddelt Færøernes Landsstyre af rigsombudet i skrivelse af 12. februar 1980. Det blev her oplyst, at der alene er tale om en udskiftning af allerede eksisterende installationer, som led i en almindelig modernisering af sådanne anlæg, samt at det forventes ikke at være påkrævet at foretage egentlige byggearbejder i forbindelse med udskiftningen.

I forbindelse med moderniseringen opføres der ganske vist 3 mand-

skabsbarakker, men disse vil blive taget ned igen, når moderniseringen er færdig, og senest i 1986. Endvidere opføres en ny radiomast på 60 meter ved siden af den eksisterende mast på 25 meter. Da alle militære radioantenner vil blive flyttet over på den nye mast, er der set fra flyvestationens side ikke noget i vejen for, at den gamle mast kan nedtages. Når det allievel er besluttet at bevare den gamle mast, skyldes dette hensynet til de øvrige brugere af masten, nemlig statens luftfartsvæsen, søredningstjenesten og de færøske radioamatører.

Til den anden del af spørgsmålet skal jeg svare, at det fortsat er regeringens opfattelse, jfr. det i 1971 tilkendegivne synspunkt, at de spørgsmål, som lagtinget har taget stilling til, vedrører riget som helhed og må vurderes ud fra denne synsvinkel. I henhold til hjemmestyreloven er forsvarsspørgsmål ganske klart et anliggende, der ikke er henlagt under hjemmestyrets selvstændige kompetence, men varetages som et rigsanliggende af rigets myndigheder. En ændring heraf vil være ensbetydende med en ændring af det statsretlige forhold mellem Færøerne og Danmark.

# 100-2. Fyrispurningur til løgmanns.

Ár 1983, mánadagin 1. august boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Jóannes Dalsgaard, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

**fyrispurningur**

1. Við hvørjari heimild hevur landsstýrið góðkent byggiloyvið, sum Tórshavnar Býráð hevur givið Forsvarets bygningstjeneste til bygging av ávísum bygningum í Mjørkadali?

2. Merkir hendan góðkenning, at landsstýrið ikki longur viðurkennir og virðir samtyktir løgtingsins frá 1960 og 1970 um hermenn og hernaðarútgerð á føroyskum øki?

**Viðmerkingar:**
Tvær ferðir, ávikavist 1960 og 1970, hevur Føroya Løgting mótmælt, at hermenn og hernaðarútgerð verða knýtt at støðini í Mjørkadali/Sornfelli og á støðini á Eiði. Gongdin annars í hesum máli má metast at vera tingmonnum kunnug, smb. løgtingsmál nr. 14/1960 og nr. 78/1968, sí Løgtingstíðindi 1970.

Hóast hesar støðir eru klárt á stríð við løgtingsins samtyktir, eru tær framvegis í landinum til stóran vanda fyri Føroya fólk, um spenningurin í heiminum endar við einum avmarkaðum ella einum altumfatandi samanbresti millum tær stóru hernaðarsamgongurnar.

Av hesum fylgir, at einhvør nútíðargerð ella útbygging av nevndu støðum má vera í stríð við samtyktir løgtingsins. Av hesum fylgir somuleiðis, at eitthvørt byggiloyvi í sambond við støðina í Mjørkadali má stríða ímóti samtyktum løgtingsins, og hevur tað tí týdning fyri almenningin at fáa at vita, hvørja heimild landsstýrið heldur seg hava til at góðkenna eitt ólógligt byggiloyvi.

Somuleiðis hevur tað stóran áhuga hjá løgtingi eins og hjá almenninginum sum heild klárt og greitt at fáa at vita, um sitandi landsstýri viðurkennir løgtingsins samtyktir ella ikki, og verður hesin fyrispurningur tí settur Føroya løgmanni.

3. august varð við 30-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

26. oktober svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis:

**svar**
**uppá**
**fyrispurning frá Jóannesi Dalsgaard til løgmann.**

*ad. 1.* Umrødda mál er avgreitt sum byggimál av landsstýrinum.

Jógvan Sundstein, løgtingsformaður, hevur spurt landsstýrið um sama mál, og er frágreiðingin til hansara viðløgd.

*ad 2.* Góðkenningin av avgerð býráðsins merkir, at eftir galdandi lóg og byggisamtykt hevur umsøkjarin lógligan rætt til tað, hann søkti um, at renovera støðina.

Góðkenningin merkir sjálvandi ikki, at landsstýrið ikki kennir seg bundið av løgtingssamtyktunum frá 1960 og 1970.

Viðmerkjast kann, at landsstýrið í apríl 1972 hevur givið løgtinginum frágreiðing um støðina í Mjørkadali. Tann frágreiðingin er eisini viðløgd.

*Sí skjølini 16 A-B*

# 100-3. Fyrispurningur til Tórbjørn Poulsen, landsstýrismann viðvíkjandi uttanlandslánum.

Ár 1983, mánadagin 1. august boðaði formaðurin frá fyrispurningi soljóðandi:

**Fyrispurningur**

1. Løgmaður upplýsir, at rentur og avdráttir av uttanlandslánum ikki eru goldin í 3 ár. Er hetta so?
2. Um so er, hvussu er tá undirskotið millum innflutning og útflutning fíggjað?
3. Eru tað landskassin, kommunurnar ella teir privatu, ið ikki gjalda renturnar av uttanlandslánunum?
4. Hvussu er býtið millum kommunurnar, landskassan og teir privatu viðvíkjandi uttanlandslánunum?
5. Hvørjar veðhaldsskyldur hevur landskassin í samband við uttanlandsskuldina?

**Viðmerkingar:**
Sum øllum kunnugt, so hevur tað verið neyðugt fyri føroyingar at læna pening uttanlands. Hetta hevur í mongum føri givið møguleikar fyri stórari útbygging bæði á sjógvi og á landi.

Tó at so átti at verið, at framleiðslan skuldi kunnað goldið í minsta lagi renturnar av teimum lánunum, ið tikin verða uttanlands.

Í løgmansrøðuni á Ólavsøku verður uppslýst, at so er ikki, og tað so langt í frá. Har verður sagt, at uttanlandsskuldin veksur automatiskt. Hetta stendur skrivað á síðu 6 í løgmansrøðuni, nevniliga soleiðis:

Eitt annað mát fyri fíggjarligu gongdini er gjaldsjavnahallið ella vøksturin í netto uttanlandsskuldini.
Hóast hetta úrslitið í landskassarokнskapinum, hóast framd tiltøk, sum hava havt positiv árin, so er uttanlandsskuldin økt munandi eisini tey seinastu næstan 3 árini, orsøkin er, at tey framdu tiltøkini hava gjørt okkum før fyri at vera fyriuttan peningatilskot frá lántøku uttanífrá fyri at reka og viðlíkahalda samfelagið. Men tiltøkini bøttu ikki so mikið um, at vit kundu gjalda rentur og kurstap av lánum, sum longu vóru upptikin, fyri ikki at tala um avdráttir. Rentur og kurstap av uttanlandsskuldini frá 1980 kosta tey 3 árini 1981, 1982 og 1983 ímillum 650 og 700 mió. kr.
Hesar útreiðslur verða debiteraðar okkum heilt automatiskt við hesari upphædd, uttan at eitt oyra afturat kemur í kassan til nýtslu ella til fløgur.

Vegna tað, at mong uttan iva hava fingið ta fatan, at landskassin ikki hevur verið og ikki er førur fyri at gjalda rentur av teimum lánum, sum landskassin hevur uttanlands, má tað haldast neyðugt, at tingmenn fáa meiri nágreiniliga at vita um hesi viðurskifti.

Tað er av stórum týdningi eisini at fáa upplýst, hvussu býtið av uttanlandslánum er millum landskassa, kommunur og tey privatu.

Av tí at landsstýrismenninir júst hava havt hesi viðurskifti á lofti í samband við, at teir hava gjørt løgmansrøðuna 1983, má haldast at fíggjarmálaráðharrin væl er førur at svara omanfyri standandi spurningum rættiliga skjótt.

3. august varð við 30-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svararst.

28. oktober svaraði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**svar**

1. rentur og avdráttir av landskassans uttanlandslánum eru goldin rættstundis í hvørjum einstøkum føri.

2. Víst verður til svarið undir 1.

3. Landskassin er ajour, sí svar undir 1. Um lánskyldu hjá kommunu og privatum, har landið ikki veðheldur, hevur umsitingin ikki kunnleika til, um rentur og avdráttir verða goldin rættstundis.
   Har landskassin veðheldur fyri nevndu lántakarar, hevur landskassin í nøkrum førum lagt út, tí lántakarin ikki hevur fíggjarliga orku til falnar rentur og gjøld.

4. Býtið av uttanlandslánum millum kommununar, landskassan og teir privatu er víst á vilagda skjali 1.

5. Veðhaldsskyldur landskassans eru vístar á viðlagda skjali II.

---

# 100-4. Fyrispurningur til løgmann viðvíkjandi undirgrunds-málinum.

Ár 1983, hósdagin 4. august boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Atla P. Dam, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

1. Vil løgmaður gera so væl at greiða frá hvat hent er í undirgrundsmálinum?

2. Við hvørjari heimild fer løgmaður undir samráðingar við ríkisstýrið um undirgrundsmálið út frá fortreytum, sum greitt eru í stríð við løgtingssamtyktina frá 1975?

3. Í røðu síni á Ólavsøku segði løgmaður, at í mun til samráðingarupplegg landsstýrisins (uppskot til kommisorium) eru smærri broytingar skotnar upp av ríkisstýrinum. Nágreinliga hvørjar eru hesar broytingar?

4. Í tíðindum frá Ritzau's Bureau eftir statsministaravitjanina verður m.a. sagt:
   »Det færøske landsstyre bøjede sig torsdag for den danske regering og indvilligede i at føre de fremtidige forhandlinger om udnyttelse af råstoffer i den færøske undergrund ud fra det ligestillingsprincip, som gælder for den grønlandske undergrund.«

Nágreiniliga hvussu langt hevur landsstýrið »bøjet sig«?

Hvussu nógv er í donsku tíðindunum um at ein slík ráevnisskipan nú er undir landi?

Hevur løgmaður gjørt nakra undirhondsavtalu við forsætismálaráðharran, sum váttar, at slík ráevnisskipan, sum umrødda (hin grønlendska) nú verður samtykt av samgonguni?

Er noktan fyri luttøku í slíkari samtykt at meta sum § 13 mál sambært samgongusáttmálan?

**Viðmerkingar:**

Samgongan hevur í mestan mun roynt at halda andstøðuna uttanfyri viðgerð av spurningum um at gera undirgrundsmál til føroysk sermál sambært tingsamtykt frá 1975.

Í flestum málum er lítið samsvar ímillum orð og gerðir samgongunnar og so er eisini í undir grundsmálum, tí er ilt hjá tingmonnum og almenningi at fylgja gongdini í hesum máli.

Sum tað skilst hevur samgongan valt trýmannanevnd at samráðast um hetta mál. Løgmaður er limur í hesi nevnd, men ikki formaður.

Kortini hevur løgmaður (landsstýrið) sersamráðingar við forsætismálaráðharran (stjórnina) har hinir nevndarlimirnir ikki luttaka. Hetta er lítið tryggjandi, tá havt verður í huga, at sambandsflokkurin var var einasti flokkur, sum ikki tók undir við samtyktini í 1975.

Við teirri ósemju sum ræður í sjálvari samgonguni og samráðingarnevndini um hetta mál eru tað sjálvsøgd óráð at fara undir samráðingar við ein partnara, sum hevur allar fyrimunirnar av hesi ósemju, serliga tá § 13 í samgonguskjalinum forðar fyri, at tað slepst longur enn ein tilvildarligur minniluti loyvir.

Kortini hevur verið samráðst, og úrslitið tykist vera, at málið er fløkt upp í ein ellibita, har aðru hvørja løtu ljóðar, at nú er greitt at samráðast og aðruhvørja, at einki samráðingargrundarlag er.

Føroyska samráðingarnevndin hevur sambært upplýsing í marknaðarnevndini sent stjórnini uppskot til »samráðingarkommisorium«, sum heimilar samráðing um:

1. at gera undirgrundsmál til føroyskt sermál sambært tingsamtykt frá 1975.

2. Ráevnisskipan sum hina grønlendsku, tó við serligum føroyskum tørvi í huga.

Henda seinasta greinin er greitt í stríð við tingsamtyktina og verður

»al den tíð« hon er framkomin hin einasta, danir vilja samráðast um. Við øðrum orðum verður nú helst samráðst um uppskot sum gongur styttri enn sambandsflokksins minnilutauppskot í 1975.

Tað er tí ikki so løgið, at danskur tíðindastovnur eftir samrøðu við forsætismálaráðharran skrivar tað sum má skiljast sum útleggingin av, hvat forsætismálaráðharrin fekk burturúr samráðing síni við landsstýrið fyrst í juli mánaði í ár.

Útleggingin var sum kunnugt hendan:

»Det færøske landsstyre bøjede sig torsdag for den danske regering og indvilligede i at føre de fremtidige forhandlinger om udnyttelse af råstofferne i den færøske undergrund ud fra det ligestillingsprincip, som gælder for den grønlandske undergrund.

Det blev resultatet af statsministerens Poul Schlüters forhandlinger med landsstyret.

Aftalen indebærer at Danmark og Færøerne skal dele overskuddet fra et eventuelt oljeeventyr lige og at beslutninger om efterforskning og udvinding forudsætter at begge parter er enige. Den danske regering og det færøske landsstyre får dermed en gensidig vetoret.

Detaljerne i en færøsk råstofsordning inden for hjemmestyrets rammer skal udformes af et særligt hurtigtarbejdende udvalg, hvor regering og landsstyre bliver repræsenteret af lige mange medlemmer. Udvalget får en færing som formand og skal udforme et udkast til en aftale med videst mulig hensyntagen til færøske interesser, som det hedder.«

Um so er, at samgongan heldur fast um at samráðast út frá nevnda »kommisorium«, hevði tað verið sømuligt, at almenningurin og løgtingið sluppu at fylgja tí leiki, sum letur okkum sjálvsagda rættin í undirgrundsmálum av hondum.

Til tess at tryggja nakað av upplýsing um tann leik sum higartil er framdur, er hesin fyrispurningur settur fram, og tí er eisini áheitan send tingformanninum um at geva frágreiðing í sama máli.

Tað er almenningsins áhugamál og krav, at ójavnarnir í samgonguni um hetta mál verða lýstir so greitt sum gjørligt.

6. mars tók Atli Dam, løgtingsmaður, fyrispurningin aftur.

Sama dag svaraði Pauli Ellefsen, løgmaður, fyrispurninginum soleiðis:

## Svar

Í samgonguskjalinum 1980 millum Samabndsflokkin, Sjálvstýrisflokkin og Fókaflokkin stendur: »Samráðingar verða førdar við donsku stjórnina um at gera undirgrund Føroya og havbotnin til føroyskt sermál«

Tá ið forsætismálaráðharrin vitjaði í Føroyum í august mánaði 1981, varð avtalað, at samráðingar um málið skuldu verða í København í seinru helvt av november mánaði. Av orsøkum, ið ikki vóru landsstýrisins, vórðu samráðingarnar ikki fyrr enn 28. januar 1982.

Hesin fundurin er fyrsti verunligi samráðingarfundurin. Í føroysku samráðingarnevndini sótu og sita enn Pauli Ellefsen, Hilmar Kass og Jógvan Sundstein, sum er nevndarformaður.

Á fundinum segði Jógvan Sundstein frá, at orsøkin til, at hann var formaður, var, at tá løgtingið í 1975 samtykti at yvirtaka málsøkið, hevði ein av teimum núverandi samgonguflokkunum, Sambandsflokkurin, sítt egna minnilutauppskot, men sum fall. Hóast hetta, segði hann, er løgtingssamtyktin gildug og stendur við.

Síðani hevur bert ein verunligur samráðingarfundur verið, nevniliga 12. oktober 1982. Fundurin 7. juli 1983 undir vitjan forsætismálaráðharrans var eingin samráðingarfundur, men bert ein fundur, har ymisk ólyst mál partanna millum vórðu nevnd. Viðvíkjandi undirgrundsmálinum handaði forsætismálaráðharrin óformliga svar hansara til uppskot okkara til kommisorium hjá eini kanningarnevnd, og segði eg honum, at tá formligt svar var komið, verður tað viðgjørt í føroysku samráðingarnevndini, meira varð ikki sagt um tað málið. Formligt svar er komið og handað nevndarformanninum.

Sum sagt frammanfyri er støðið hjá føroysku nevndini løgtingssamtyktin frá 1975.

Danska støðið er, at ein fullkomiælig og óafturtakilig avhending av yvirvaldi ríkisins yvir undirgrundini til part av ríkinum ella fólkið har ella til ein heimastýrismyndugleika er ógjørlig eftir donskum rættarsjónarmiðum eins og tað ikki er sameiniligt við ríkisfelagsskapin at lata Føroyum einarættin til ráevnini í undirgrundini.

Seinri hevur ein meiriluti í føroysku samráðingarnevndini víst aftur uppskotið frá donsku stjórnini um at seta niður eina felags føroysk/danska kanningarnevnd.

Síðani hevur løgtingið samtykt at seta niður eina føroyska nevnd at kanna spurningin um yvirtøku av undirgrundini.

Eg kenni meg bundnan av samgongusamtyktini um at samráðast um yvirtøkuna, landsstýrið hevur tí ikki boygt seg, og tað eru tí heldur ongar avtalur um cina rácvnisskipan.

F.L.j.nr. 1201-7.

# 100-5. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann, viðvíkjandi røktardeild á Landssjúkrahúsinum.

Ár 1983, leygardagin 6. august boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Jákup Lindenskov, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

Hvussu langt áleiðis eru ætlanirnar um at gera deild P 5 á Landssjúkrahúsinum til røktardeild komnar?

**Viðmerkingar:**
Síðani deildin nevnd P5 á Landssjúkrahúsinum var fráflutt í 1980, hava hesi høli, sum rúmaðu 22 fólkum staðið ónýtt sum sjúkradeild.

Hetta eru hølini, ið brúkt vórðu av andveikraforsorgini, til nýggju húsini hjá andveikraverndini vórðu tikin í brúk í 1980.

Tásitandi landsstýri hevði longu í 1979 samráðingar við innanríkisráðið um at brúka deild p 5 til røktardeild, og innanríkisráðharrin segði tá, at teir høvdu einki at siga ímóti, at deildin varð brúkt til røktarsjúklingar — og har kundu so ið hvussu er eini 20 sjúklingar fingið pláss.

Hetta hevði gjørt ein mun í teirri sera ótryggu støðuni, vit eru í, so leingi veruligt røktarheim ikki er bygt í Tórshavn.

Tað er tí eg spyrji landsstýrismannin, um hann nú vil syrgja fyri, at henda deild verður tikin í brúk til tað endamál, sum fyrra landsstýrið hevði ætlað — og sum nú hevur ligið á láni síðani 1980.

6. august varð við 29-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

31. oktober svaraði Páll Vang, landsstýrismaður, fyrispurninginum solciðis

**svar**

Landsstýrið hevur endaliga samtykt at umvæla og umbyggja deild 5 til røktardeild fyri psykiatriskar sjúklingar.

Arbeiðið verður byrjað fyrst í komandi ári, og er ætlanin, at hendan deildin kemur at virka frá á heysti 1984.

# 100-6. Fyrispurningur til fíggjarmálaráðharran Tórbjørn Poulsen viðvíkjandi afturhaldi av studningi til skip og fiskimenn.

Ár 1983, hósdagin 4. august boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Atla Dam, løgtingsmanni.

1. Við hvørji heimild afturheldur landsstýrið studningi, sum sambært lóg skal útgjaldast skipum og fiskimonnum?
2. Vil fíggjarmálaráðharrin taka stig til, at tað »lógloysi«, sum landsstýrið fremur mótvegis lánveitarum og øðrum kreditorum hjá ávísum skipum beinanvegin verður steðgað?
3. Vil fíggjarmálaráðharrin ístaks taka stig til, at slík »konfiskatión« bert verður framd sambært avtalur, tryggjaðar reglur ella lógarheimild?

**Viðmerking:**
Landsstýrið er farið undir at leggja hald á tann studning, sum sambært lóg skal verða útgoldin pørtum av skipaflota okkara.

Hetta verður gjørt, tá skip ella feløg á ein ella annan hátt eru komin í eftirstøðu til landskassan.

Tað er bæði gott og rætt, at landsstýrið roynir at fáa eftirstøður inn, og tað er eingin loyna, at prioritetsstøðan av skuld til landskassan oftast er hin veikasta. Heldur ikki er tað nøkur loyná, at bíðað verður sum longst við at gjalda skuld til landskassan ella roynt at sleppa undan at gjalda.

Men landsstýrið kann ikki loyva sær at taka sær rættindi, sum greitt eru í stríð við rættin hjá øðrum síðustillaðum ella framanfyristandandi kreditorum og lánveitarum.

Skal landsstýrið krevja eftirstøðu sína inn við mótrokning í studningi, má landsstýrið nýta mannagongd, sum heimilað er við lóg, t.v.s. senda krøv síni til vanliga innheinting (inkasso), ella mótrokna sambært avtalu við eigaran av studninginum og aðrar kreditorar.

Í fíggjarnevnd løgtingsins hevur undirritaði úrslitaleyst eftirlýst frágreiðing um hesa nýggju mannagongd landsstýrisins, m.a. um hvørjar reglur eru galdandi, hvør skuld verður mótroknað, hvørji kriteriir eru galdandi fyri at tryggja, at landsstýrið ikki tilvildarligt leggur eftir monnum og feløgum, sum ikki eiga sess á fjallinum o.s.fr.

Heldur ikki hevur verið møguligt at fáa frágreiðing um hvørja ávirkan hendan mannagongd fær á komandi studningsskipanir ella um samsvarið ímillum hin dokumenteraða vilja tingsins til at halda flotanum í vinnu og møguleikar hansara fyri at verða í vinnu, tá studningurin verður afturhildin 100%.

Samsvarið ímillum galdandi praksis við kreppulánsveiting og nyggju mannagongdina tykist heldur ikki umhugsað.

Landsstýrið er vitandi um, at flestu skiparoknskapir, sum sýna avlop, kortini hava so smá avlop, at hesi eru minni enn samlaða stuðulsveitingin til sama skip, tí er einki samsvar ímillum eina 100% bandlegging av studningi og ætlanina við stuðulsveitingunum sum sv.

Tað má tykjast ósømiligt út um alt mark, at landsstýrið als ikk upplýsir fyri peningastovnum, leverandørum og øðrum ahugaðu at hjá ávísum skipum er eingin stuðulsskipan galdandi, tá n. landsstýrið verið orsøk til, at hesi hava latið lán ella útgerð unun følskum fortreytum.

Slík mannagongd kann bert elva til, at lánstovnar og kreditorar fara at kapprenna við landsstýrið um at gera útlegg av tí studningi, skipið sambært lóg eigur. Í slíkum føri verður landskassin tapar Tí átti slík skipan ikki at verið s... nering. Men sum ikki eitt fyrr sigst ... tørvandi innlit, ið eyðkennir fíggparligu ...

Landsstýrið má vera vitandi um, at stuðulsveitingar til ... sløg er av slíkari upphædd, at fellur hon burtur, er tað ... við, at hesi skip fara av knóranum.

Tað er eingin loyna, at sitandi samgongja ... skip ella fyritøkur láka fyri lógini. Kortim má í slíkum ... krevjast, at her eru heilt greiðar reglur at ... seta borgararnar javnt. Fyrr enn slíkar ... tyktar, kann eingin framhaldandi handleggjan av studningi ...

T.d. eru greiðar reglur fyri afturhaldan av peningi fyri skattaskuld.

Vit vita, at útleggini fyri ávís skip í nýggjari vinnu eru risastór, samstundis eru tilskotini til somu skip risastór, skal vinnan halda fram (t.d. nýggju svartkjaftaskipini), men tað kann kortini ikki vera rætt, at hesi skip verða viðgjørd eftir øðrum reglum enn onnur, tað vil siga, at verða reglurnar ikki broyttar, so eru hesi skip longu farin av knóranum.

Tað hevði verið mannsømiligari, at landsstýrið bart út segði, at tað nú var farið undir enn ein tátt, sum skal geva landsstýrinum (samgonguni) møguleika til at beina skip og virkir hagar, sum landsstýrinum hóvar best.

6. december svaraði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

1. Heimildin fyri, at landsstýrið afturheldur studning, sum sambært lóg skal útgjaldast skipum, er tann, at landsstýrið eftir vanligum løgfrøðiligum reglum kann fremja mótrokning mótvegis skuldara, tá
   1. krav og mótkrav eru komputabel (t.e. kunnu útlíkna hvørt annað), sum dømi: peningakrøv,
   2. krav og mótkrav skulu vera búgvin til at fremjast millum ognaran og skuldaran,
   3. kravið er millum somu partar.

   Fyri fiskimenn galda somu treytir fyri mótrokning av skattaeftirstøðuni sum fyri aðrar borgarar. Heimildin er § 83 í skattalógini.
2. Landsstýrið hevur samtykt at mótrokna 50% av kravinum, tó at mótrokningin í serligum førum kann fara niður til 30%. Gjaldstovan umsitur hesa skipan.

F.L. 1415-17.

# 100-7. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann, viðvíkjandi telefonsambandinum við Svínoy og Fugloy.

Ár 1983, mánadagin 5. december boðaði formaðurin frða einum fyrispurningi frá Eli Nolsøe, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

**Fyrispurningur**

1. Hvør er orsøkin til, at svínoyingar og fugloyingar megu bíða út við 2 ár fyri at fáa telefon innlagda?

2. Nær fáa fólk á hesum oyggjum, sum leingi hava staðið á bíðilista, telefonina innlagda?

3. Vil landsstýrismaðurin í samráð við bygdaráðini arbeiða fyri, at smáplássini, sum hava nógva ferðamannavitjan, fáa mynttelefonir uppsettar?

**Viðmerkingar:**

Úti í Svínoy og Fugloy gongur tað striltið hjá fólki at fáa telefon innlagda. Tey, sum biðja um telefon, fáa at vita, at tey koma á bíðilista, men so hendir einki meira. Eg veit um tey, sum hava staðið á hesum bíðilista út við 2 ár, og sum enn onga telefon hava fingið.

Talan er bæði um ung fólk, sum hava hug at búsetast aftur í heimbygdini og um eldri fólk, sum í aðrar mátar illa fáa boð frá sær, um okkurt var áfatt.

Nú ein »Tyrla« aftur fer at flúgva til útjaðaraøkini, verður tørvurin á telefonsambandi størri, enn hann hevur verið frammanundan, tí tey, sum eru flutt av hesum báðum oyggjum fyri at koma í vinnu inni á meginøkinum, fáa nú betri umstøður at ferðast út aftur enn áður, eitt nú fyri at kunna umsita ognirnar, sum tey eru farin frá. Sjálvsagt hava hesi fólk rætt til telefon eins og øll onnur. Í stuttum er at siga, at tørvurin á øllum teimum hentleikum, sum vit onnur hava, ið búgva í meginøkinum í samfelagi okkara, tíbetur alt meira

ger seg galdandi í útjaðarinum, og hesin tørvur er ikki minni átrokandi hjá teimum, tí tey í so mangar mátar liggja verri fyri.

Vantandi útbygging av telefonsambandinum er við til at darva menningini á smáplássunum, og tað átti helst ikki at verið so í dag, at hetta at hava telefon, var ein frammíhjárættur. Annað er, at náttúran dregur ferðafólkið í útoyggjarnar. Bæði til Fugloynna og Svínoynna koma ferðafólk í stórum tali á hvørjum sumri, og her kemur telefonin aftur inn í myndina. Bæði fyri tey ferðandi og bygdafólkið hevði tað verið ein fyrimunur, um mynttelefonir vórðu uppsettar á ávísum støðum til taks fyri tey ferðandi.

Út frá hesum loyvi eg mær at seta landsstýrismanninum, sum hevur Telefonverk Føroya Løgtings sum sítt málsøki og harumframt eitt so týðandi mál í hesum sambandi sum bygdamenning hesar spurningar.

6. december varð við 18-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

6. februar 1984 varð fyrispurningurin svaraður.

**Svar**

1. Svínoyar bygd er útbygd við 30 kanalum, ið allar eru í brúki. ein umsøkjari stendur á bíðilista. Viðkomandi sendi umsókn inn 29/6-1983.
   Fugloyggin er útbygd við 30 kanalum. Av teimum verða 26 nýttar til 14 felagar á Kirkju og 12 í Hattarvík. Vegna tekniskar trupulleikar eru tær 4 eftirverandi kanalirnar ikki í rakstri. Ein umsøkjari stendur á bíðilista, og var hansara umsókn send inn 8/3-1983. Síðan hevur verið arbeitt við at loysa hesar rættuliga fløktu teknisku trupulleikar.

2. Tær verandi telefonskipanir eru sostatt tvær 30-kanalskipanir, ein til Fugloynna og ein til Svínoynna, báðar gangandi út frá Viðareiði. Tað er kostnaðarmikið at útbyggja kapacitetin á radioskipanunum. Tí verður nú arbeitt við hesum ætlanum fyri Fugloynna og Svínoynna.
   Í Svínoy verður nú kannað eftir møguleikum at nýta radiotransmissiónsskipanina frá Froðbiar Nakki til Eystnrhøvda at viðka kapacitetin við. Henda skipan er upprunaliga ætlað til bert at verða nýtt til Maritim VHF, og í samband við FM-útvarpssend-

aran, umframt sum arbeiðstelefon hjá TLF. Av tí at tað framvegis er kapasitetur eftir í hesi radioskipanini, verður nú kannað eftir møguleikaum at útbyggja og leingja transmissiónina frá Eysturhøvda til Svínoyar bygd, fyri at fáa nakrar kanalir afturat. Í samband við Fugloynna er at siga, at arbeitt verður við at fáa tær 4 nevndu kanalirnar í rættlag.

3. At seta mynttelefonir upp á smáplássum, ið eru knýttar at automatiskum telefonstøðum gjøgnum radiskipanir, krevur serstaka útgerð. TLF hevur fyri tíð síðan sett í verk kanning av hvørjar møguleikar, vit hava fyri at seta mynttelefonir upp í hesum bygdum. Úrslitið fyriliggur ikki enn.

Frá Svínoy er frá í fjør ein umsókn um mynttelefon, sum enn ikki er avgreidd samb. frágreiðingina framanfyri.

Telefonviðurskiftini í útoyggjunum eru annars nógv batnað, sí fylgjandi yvirlit:

**Tallø av feløgum.**

| | í 1973(31/3) | í 1983(15/12) |
|---|---|---|
| Fugloy | 0 | 26 |
| Svínoy | 12 | 30 |
| Kunoy | 13 | 30 |
| Kallsoy | 12 | 49 |
| Hestur | 2 | 22 |
| Skúvoy | 4 | 30 |
| Mykines | 4 | 6 |

F.L.j.nr. 1901-33.

# 100-8. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann viðvíkjandi Múlavegnum.

Ár 1983, mánadagin 5. december boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Eli Nolsøe, løgtingsmanni, og var hann soljóðandi:

1. Hvussu nógvur peningur er brúktur til Múlavegin í ár?

2. Hvussu nógvur peningur er enn til taks?

**Viðmerkingar:**
Á scinastu fíggjarløgtingslóg vórðu 1 mió. kr. avsettar til arbeiðið uppá Múlavegin. Tá hetta varð hildið at vera ov lítið, fekst tú tað svar, at hetta var ivaleyst, tí við upphæddini, sum stóð eftir frá tí arbeiðið varð niðurlagt summarið frammanundan, vóru o.u. 2,5 mió. kr. nú tøkar at arbeiða fyri í hesum árinum (1983).

Í ár byrjaði arbeiðið ikki fyrr enn í juni mánað, og samanhangandi hevur ongantíð verið arbeitt meira enn 2 mánaðir [illegible] verulig gongd ikki kom á arbeiðið fyrr enn í augusti.

Nú ljóðar, at arbeiðið skal stoðga, tí eingin peningur er eftir. Hetta ljóðar so løgið, at eg lovvi mær at seta landsstýrismanninum Pálli Vang, sum umsitur hetta málsøki, hesar spurningar.

6. december varð við 19-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurniugurin skuldi svarast.

15. december svaraði Páll Vang, landsstýrismaður, fyrispurningunum soleiðis:

**Svar**

Mær eru settir tveir spurningar:

1. Hvussu nógvur peningur er brúktur til Múlavegin í ár?

2. Hvussu nógvur peningur er enn til taks?

*Svar:*

*1. sp.:* Farið varð undir vegagerðina í juni 1982 og helt arbeiðið áfram til jóla.

Í juni mánaði í ár, varð arbeiði uppafturtikið og helt áfram til 1. dec., tá játtanin uðdá 1,0 mió. var uppbrúkt.

*2. sp.:* Ongin peningur er til framhaldandi arbeiði í verandi fíggjarári.

# 100-9. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann, viðvíkjandi ábótum á landsvegakervið.

Ár 1983, hósdagin 15. december var fyrispurningurin frá Kariu Kjølbro, løgtingslimi, fráboðaður, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

Hvat kostar tað at seta í verk tær ábøtur á landsvegakervið, sum ein samd Vega- og havuanevnd mælti løgtinginum á vári 1982 og 1983 at fremja, og sum eitt samt løgting tók undir við?

**Viðmerkingar:**
Vegir og havnir eru týdningarmikil, tá talan er um menning og framburð í einum landi. Atløgubryggjur og flutningur av rávørum hava serligan týdning í samfelagi, har tað, ið fæst úr sjónum, er álitið.

Fins og m.a. arbeiða, eydna og trivnaður eru komin við vegasambandi og havnaløgum, so hevur samfelagið eisini goldið dýrt við mongum sorgarleikum seinastu árini.

Í tíðarskeiðinum 1971-1981 (bæði árini iroknað) hava 66 fólk í landi okkara latið lív í samband við ferðsluvanlukku (sbr. árs frágreiðing landslæknans 1981).

Leggjast kann helst aftrat, at tey flestu hava verið børn og ung. Eisini má nevnast, at uppaftur stórri tal eivað hevur mist heilsuna og fingið varandi men.

Ásannandi at støðan er sera hættisleg, og at nakað má gerast, hevur tjóðveldisflokkurin, ið hevur 2 umboð í løgtingsins Vega- og havnanevnd, eftir førimuni roynt at gera nakað fyri at bøta um ferðslu trygdina.

Í áliti frá nevndini hin 23. apríl 1982 tók ein samd nevnd undir við soljóðandi viðmerkingum:

Vega- og havnanevndin hevur havt fund við umboð fyri Ráðið fyri Ferðslutrygd til tess at fáa spurningin um ferðsluvanlukkur nærri lýstan. M.a. er nevndin vorðin varug við, at talið á álvarsligum ferðsluvanlukkum og óhappum hevur verið vaksandi í landi okkara, meðan tølini í grannalondunum vísa seg at vera niðurgangandi.

Vega- og havnanevndin fekk at vita, at eftir áskoðan ráðsins eru ávís støð í landsvegakervinum serliga vandamikil, eitt nú vegurin í Streymnesi ímóti brúnni eins og vegurin við skúlan á Giljanesi og við skúlan í Gøtugjógv.

Vísandi til omanfyri standandi setti vega- og havnanevndin fram soljóðandi uppskot til samtyktar:

Landsstýrinum verður álagt at bera so í bandi, at nevndu viðurskifti verða fingin í rættlag.

Tá Vega- og havnanevndin hittist aftur í vár, vendu vit okkum til Ráðið fyri Ferðslutrygd til tess at frætta, hvat landsstýrið hevði fingið av skafti viðvíkjandi áheitanini frá løgtinginum.

Tað mátti tá ásannast, at als einki varð hent yvirhøvur við teimum spurningum, ið løgtingið hevði víst á.

Øll Vega- og havnanevndin tók síðani undir við viðmerkingum Tjóðveldisflokksins til álitið frá 16. mai 1983, ið vóru soljóðandi:

Í royndunnm at bøta um ferðslutrygdina á landsvegakervinum, hevur Vega- og havnanevndin aftur í ár havt fund við umboð fyri Ráðið fyri Ferðslutrygd.

Í hesum sambandi var víst til seinasta álit frá Vega- og havnanevndini í fjør, har ávís støð í landsvegakervinum vóru umrødd sum serliga vandamikil, eitt nú vegurin í Streymnesi móti brúnni eins og vegurin við skúlan á Giljanesi og við skúlan í Gøtugjógv.

Tí setti ein samd Vega- og havnanevnd tá fram soljóðandi uppskot:

»Landsstýrinum verður álagt at bera so í bandi, at nevndu viðurskifti verða fingin í rættlag.«

Tað vísir seg nú, at einki er gjørt við henda spurning, og tað verður hervið átalað.

Á fundi við ráðið fyri ferðslutrygd í ár eru eisini onnur vandamikil vegastrekki umrødd, eitt nú landsvegurin gjøgnum Søldarfjørð eins og íbindingin frá nýggja Hotel Føroyum í Oyggjarvegin.

Í Kollafjarðardali er eingin »lummi« til bussin hjá Bygdaleiðum. Tað merkir, at bussurin má steðga á landsvegabreytini, har ferðslan er 80/km um tíman.

Á Stykkinum er tørvur á eintum spegli til tess at bøta um útsýnið.

Eisini varð nevnt, at trupulleikar eru við avmerkingum á landsvegnum.

Av tí at løgtingsins Vega- og havnanevnd ásannar, at neyðugt er at gera nakað við ferðslutrygdina, og tað ikki eydnaðist í fjør við eini løgtingssamtykt, hevur ein samd Vega- og havnanevnd í ár avgjørt at seta kr. 200.000 til at bøta um ferðslutrygdina við. Nevndin áleggur samstundis landsstýrinum at nýta peningin í tráð við tað, sum omanfyri er nevnt.

Árið 1983 hevur í norðurlondum fingið heitið Nordiskt Trafiksäkerhetsår 1983. Í hesum sambandi er vert at minna á, at meðan talið av fólki, ið letur lív í ferðsluni er minkandi í grannalondum okkara, so er talið vaksandi hjá okkum.

Serliga ferðslunevndin undir landsstýrinum við fútanum sum formanni kom við drúgvum áliti í fjør í samband við uppskot til broytingar í ferðslulógini. Nakað nýtt her hjá okkum og ókent í øðrum londum var eitt uppskot um, at løgreglumenn í serligum førum kundu taka koyrikortið upp á staðið frá ungfólki, ið koyra ábyrgdarleysa koyring. Orsøkin til hetta uppskot var prógv um, at tað serliga eru ungir og óroyndir bilførarar, ið eiga lut í álvarsomu ferðsluvanlukkunum.

Henda nýhugsan vann ikki sóma í løgtinginum. Hildið varð, at ungfólk sum heild við slíkum uppskoti vóru fyri beinleiðis mismuni. Taltilfarið, ið var grundarlag fyri uppskotinum var helst ikki bygt yvir nóg drúgvt tíðarskeið, sum tað kanska kundi verið í dag. Soleiðis sum viðurskiftini eru vorðin, er tó mangt, ið bendir á, at júst hesin spurningur verður at taka uppaftur.

Ilt er at gera mannamun ella mismun og t.d. seta einvís tiltøk mótvegis ávísum fólkum — eitt nú ungfólki, men tað kann gerast neyðugt eins og tað kann gerast neyðugt eitt nú at plombera bilarnar, so tað ikki er gjørligt at koyra skjótari enn 100 km/tíman.

Hetta mál er í heyst tikið upp aftur í Vega- og havnanevndini. Formaðurin har hevur síðani gjørt undirritaðu varuga við, at eitki kann vera gjørt, tí peningur ikki er til taks.

Havandi í huga, hvussu fundirnir í Vega- og havnanevndini fara fram, tá avsetti peningurin skal býtast út, er sera umráðandi, áðrenn hesir fundir fara fram, at vita, hvat tað kostar, sum Vega- og havnanevndin og løgtingið saman við tveimum landsstýrismonnum í longu hava samtykt, skal framjast, so tað kann takast frá [illegible] løgtingsmenn setast at samráðast um, hvat skal gerast í [illegible]

24. januar 1984 varð við 25-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

22. februar svaraði Páll Vang, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Karin kjølbro spyr um, hvat tað kostar at seta í verk tær ábøtur á landsvegakervið, sum ein samd vega- og havnanevnd mælti løgtinginum til á vári 1982 og 1983 at fremja, og sum eitt samt løgting tók undir við til tess at bøta um ferðsluviðurskiftini.

Hyggur ein í álitini frá havna- og veganevndini eru hesi sonevndu vandamiklu pláss: vegurin í Streymnesi, við skúlan á Giljanesi, við skúlan í Gøtugjógv, íbindingin við Hotel Føroyar, vegurin gjøgnum Søladarfjørð og manglandi lummi til bussin í Kollafjarðardali.

Taka vit tey seinast nevndu fyrst, so er tað at siga um lummar ella øðrvísi myndað haldipláss hjá bussunum, at landsverkfrøðingurin hevur framt tílík tiltøk á nøkrum plássum: Kvívík, Stykkinum og Hvítanesi í samráð við Bygda- og Bussleiðina. Fyri stuttum hevur Bygdaleiðir biðið um samráðingar við landsverkfrøðingin fyri at fáa haldipláss á Oyggjarvegnum, í Kollafirði og á cystaru síðuni á Streymoynni, tilsamans 10 pláss, og júst í hesum døgum eru samráðingarnar byrjaðar. Heilt leysliga mett kunnu hesi pláss roknast at kosta 1,5—2 mill. kr.

Í Søldarfirði er ætlanin at gera nýtt landsvegastrekki omam fyri alla bygdina — úr Skriðunum og inn á Gøtueiði — og tað er eisini greitt at fara undir; projektið er liðugt og ein partur av lendinum er ognað; men peningur hevur ikki verið at fáa; tí er gjøgnum fleiri ár eftir fíggjarligum førimuni hjálpt uppá tann gamla vegin, og tað verður tað framvegis; men at skýra hann sum vandamiklan, hevur einki við verunleikan at gera.

At íbindingin við Hotel Føroyar skal vera serliga vandamikil er heldur ikki rætt; men um vegurin her hevði fingið eina vinstrasnaringarbreyt fyri norðurgangandi ferðslu og eina høgrasnaringarbreyt fyri suðurgangandi ferðsluna og bussurin fingið sítt serliga haldipláss uppi við vegin, høvdu umstøðurnar verið betri; hesar broytingar eru projekteraðar; so fáa vit at síggja hvussu verður við peninginum, og hvør ið skal gjalda: hotellið ella landið ella býurin ella tveir ella allir partar í felag. Kostnaðurin er mettur til 550.000 kr.

Síðan verður tikið til, at vandamikið er við skúlarnar við Gøtugjógv og á Giljanesi. Hartil er at siga, at í báðum støðum kunnu bussarnir taka uppí og seta av børn uttan at hesi koma á koyribreytina á landsvegnum; foreldur, sum koma við børnum, kunnu eisini seta tey av undir tryggum umstøðum. So tann stóri vandin kann neyvan vera har.

Í Streymnesi sum so manga aðrastaðni í landinum gongur landsvegurin soleiðis, at sethús liggja báðumegin vegin, aðrastaðni liggja húsini í bygdini øðru megin og havnalag ella annað, bygdafólkið hevur sína dagligu gongd til, hinumegin.

Tann loysn, sum í hesum føri verður brúkt fyri at gera viðurskiftini dámligari ferðsluliga, verður tí ivaleyst eisini nýtt nógva aðrastaðni, um fólki dámar hana og hon eftir øllum at døma er tann bati, sum treingist, so tað er av týdningi at finna tiltak sum ikki er óneyðuga kostnaðarmikið.

Landsstýrið hevur so sett á fíggjarlógaruppskotið pening til hetta endamál.

# 100-10. Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann. Veðranesprojektið.

Ár 1984, hósdagin 2. februar boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Jóannes Dalsgaard, løgtingmanni, sum var soljóðandi

**Fyrispurningur**

Hevur landsstýrið nakra ætlan um at lata Orkuráðið kanna tað sonevnda Veðranesprojektið í mun til »Fiði 1 og 3«?

**Viðmerkingar:**
Tað kunnu sjálvsagt vera tvingandi grundir fyri at frenja løku av lendi til útbygging av orkumegini, tá samfelagsáhugamál tala fyri tí.

Tað er nú vorðið stórt orðaskifti um orkuútbyggingina í Føroyum, samstundis sum munandi ójavnar tykjast verða um, hvat rættast er at gera.

Tí er tað av stórsta áhuga at fáa fram í ljósið, hvørjar nýggjar upplýsingar, sum gevast kunnu í hesum stórmáli.

6. februar varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

15. februar svaraði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fyrispurningnum soleiðis:

**Svar**

Tá ið tann stóra útbyggingarætlanin [illegible] parti av Eysturoy, Streymoy [illegible] sett á stovn fyri at ráðgeva landsstýrinum [illegible]

Sum øllum kunnugt hevur Orkuráðið kannað hesa vatnmeʀútbyggingarætlan sera gjølla m.a. við sakkønari hjálp frá norska verkfrøðingafelagnum A. B. Berdal A/S.

Alt hetta rúgvusmikla tilfarið hevur verið viðgjørt í bløðum og í útvarpi, og løgtingið hevði eitt serligt orðaskifti um orkuviðurskifti grundað á hetta tilfar.

Landsstýrið hevur seinni givið SEV loyvi at fara undir útbygging av tí partinum av projektinum, ið verður kallað Eiði 1 og 3, treytað av, at SEV fær tey neyðugu loyvi til vega.

Í bløðunum er nú komin fram ein ætlan um at byggja út við Veðranesleiðina í staðin fyri.

Orkuráðið hevur alla tíðina fylgt við í tí orðaskifti, ið farið er fram viðvíkjandi orkuspurninginum í fjølmiðlunum, og tá ið landsstýrið heitti á ráðið um at fara undir at kanna Veðranesprojektið gjøllari stutt eftir at tað kom fram, hevði ráðið longu tikið tey fyrstu stigini til at fyrireika eina slíka kanning.

Henda kanningin verður framd so skjótt, sum til ber, og úrslitini verða tøk, so skjótt landsstýrið hevur fingið tey í hendur og hevur viðgjørt tey.

F.L.j.ur. 1215-19.

# 100-11. Fyrispurningur til Tórbjørn Poulsen, landsstýrismann, viðvíkjandi vandamiklum burturkasti.

Ár 1984, hósdagin 2. februar boðaði løgtingsformaðurin frá fyrispurningi frá Jákupi Lindenskov, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

**Fyrispurningur**

Hvørji stig vórðu tikin undir vitjan forsætisráðharra Poul Schlüters í fjør summar í samband við útleiðing og burturkasti av vandamiklum evnum í føroyskum umhvørvi?

Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið í hesum máli?

**Viðmerkingar:**

Tað kann standast stórur vandi fyri umhvørvi á føroyskum sjóøki, um stig ikki verða tikin til at fyribyrgja og eygleiða burturkast og útleiðing av vandamiklum burturkasti í Atlantshavinum.

Vit hava lítla vitan um, hvat verður burturkastað og sum rennur á sjógv av slíkum evnum frá iðnaðarlondunum í Europa.

Tað má vera ein meginuppgáva, at vit sum mest byrgja fyri, at sjóøkið verður órógvað av slíkum evnum, sum menn vita, bera í sær týnandi avleiðingar.

Tað er lívsgrundartagið, sum kann verða nítað undan okkum, um vit her ikki eru á varðhaldi.

Á sumri 1983 var umhvørvismálaráðharrin spurdur um, hvørji stig hann vildi taka til tess at forða fyri møguligum hóttandi avleiðingum av slíkum burturkasti og útleiðingum — og um hann vildi skipa fyri, at eftirlit var á hesum øki.

Forsætisráðharrin svaraði, at hann á vitjan síni í Føroyum í juli 1983 vildi tingast við landsstýrið um hesar spurningar.

6. februar varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

15. februar svaraði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Til spurningin, um hvørji stig vórðu tikin undir vitjan forsætisráðharra Poul Schlüters í Føroyum í fjør summar, útleiðing og burturkasti av vandamiklum evnum í føroyskum umhvørvi viðv., er stutt at siga, at málið varð ikki umrøtt.

Ætlanir landsstýrisins viðv. dálking av umhvørvinum, eru lýstar í svari løgmans til Petur Reinert, løgtingsmann, samanb. løgtingsmál nr. 100-21/82.

Tann arbeiðsbólkur, sum settur varð á heysti 1981 at kanna spurningin, um við kongaligari fyriskipan at seta lóg nr. 130 frá 9. apríl 1980, »Om beskyttelse af havmiljøet« í gildi í Føroyum, er liðugur við arbeiði sítt.

Málið hevur síðani verið til viðgerðar í Miljøstyrelsen og í forsætismálaráðnum, og er júst í hesum døgum vorðið fyrilagt landsstýrinum til støðutakan.

Tað, sum landsstýrið skal taka støðu til er, um Marpolkonventiónin skal setast í gildi í Føroyum, um skyldurnar sambært konventiónina skulu lúkast við kgl. fyriskipan t.e. at seta ta donsku lógina um havumhvørvi í gildi í Føroyum við ávísum broytingum, ella um setast skal í verk serstøk løgtingslóg um dálking av havinum.

Áðurnevndi arbeiðsbólkur hevur evnað til uppskot um kgl. fyriskipan eins og forarbeiði er gjørt til møguliga løgtingslóg.

# 100-12. Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann, viðv. umlættingarheimi í Vági fyri brekað.

Ár 1984, fríggjadagin 17. februar boðaði formaðurin frá fyrispurningi til omanfyrinevnda frá Ova Mikkelsen, løgtingsmanni.

**Fyrispurningur**

1. Nær varð nevndin, sum skuldi viðgera hetta mál, sett?
2. Er nakað álit komið frá nevndini, og um ikki, nær kann slíkt væntast.
3. Hvat líður við at gera húsini til endamálið?
4. Nær kann væntast, at húsini verða tikin í nýtslu til endamálið?

**Viðmerkingar:**
Tá tey gomlu húsini hjá Loranstøðini Yviri á Bakka í Vági vórðu keypt fyri fleiri árum síðani, varð avgjørt, at tey skuldu nýtast til umlættingarhús fyri brekað.

Mær vitandi varð tá sett ein nevnd til at kanna og viðgera málið. Nú man vera so langt síðani, at hetta hendi, men mær vitandi er higartil einki alment komið fram ella hoyrst um málið, og loyvi eg mær tí at seta landsstýrismanninum, sum hevur hetta mál um hendi, henda fyrispurningin.

21. februar varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

9. mars svaraði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Føroya Løgting samtykti 28. apríl 1980 at keypa bygningarnar hjá Loranstøðini í Vági.

Danska fíggjarnevndin samtykti 11. februar 1981, at ognirnar kundu avhendast til landsstýrið.

Eftir at allir formalitetir vóru avgreiddir, handaði Farvandsdirektoratið landsstýrinum ognirnar 8. apríl 1983.

13. juni 1983 setti landsstýrið eina nevnd við umboðum fyri Almannastovnna, Meginfelag teirra Brekaðu, Javna, Andveikraverndina og Vágs Býráð.

Nevndin fekk til uppgávu at gera reglugerð fyri sjálvsognarstovnin Vistarheimið í Vági við vistardeild og verkstaðardeild, heruppií reglur um virksemi stovnsins og talið av pensjónistum, ið skulu ávikavist búgva har og vera í dagpleygu og á verkstaðnum.

Harumframt fekk nevndin ta uppgávu at virka sum byggjinevnd viðvíkjandi umbygging og innrættan av vistarheiminum.

Nevndin skal í hesum mánaðinum saman við arkitektinum gjøgnumganga tekningarnar. Farið verður undir umbyggingina í summar og væntandi kann heimið takast í nýtslu um eitt ár.

F.L.j.nr. 1010-17.

# 100-13. Fyrispurningur til løgmann. Viðvíkjandi kreppustøðu fiskivinnunar.

Ár 1984, týsdagin 21. februar boðaði løgtingsformaðurin frá fyrispurningi frá Juul Jacobsen, løgtingsmanni, til løgmann, sum var soljóðandi

**Fyrispurningur**

Árið 1984 byrjaði eins og 1975 við at fiskiskipaflotin gjørdi vart við vánaligu fíggjarstøðu sína. Skipini vórðu løgd, tí tað ikki kundi svara seg at loysa frá landi.

Á fundi við nevndina í felagnum Trolskip hevur landsstýrið sagt seg arbeiða við at finna eina loysn fyri at hjálpa flotanum undan at koma í eina enn størri kreppu.

Skipini lógu still einar 14 dagar, men fóru so útaftur, eftir at hava fingið munnligt lyfti frá landsstýrinum, um at tað (landsstýrið) vildi finna eina loysn.

Fyri at kunna fáa endarnar at røkka saman, eru fleiri skip byrjað at landa uttanlands. Hetta hevur vundið uppá seg, og sær út til at fara at vinda alt meir og meir uppá seg. Ein kann ikki dadla teir einstøku skipaeigarnar/skipararnar fyri at teir gera so, men síggjast má í eyguni, at henda roynd teirra at yvirliva, kemur øðrum aftur um bak, við tað at arbeiði á landi minkar, so hvørt fleiri lastir fara av landinum.

Nú eru 6 vikur síðan skipini, í trúgv á lyfti landsstýrisins, aftur løgdu til havs, og verður løgmaður tí spurdur:

1. Hvat ætlar landsstýrið at gera fyri at bøta um tað vánaliga úrslitið, sum bæði eigarar og fiskivinnuráðið forútsiga, og sum kemur at teljast í hundraðtalsmilliónum?

2. Um landsstýrið ætlar at koma við eini loysn, nær kemur hon?

22. februar varð við 28-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

9. mai svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Víst verður fyrst og fremst til løgtingsmálini nr. 134/1983: Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna, sum eru løgd fyri løgtingið.

Tá spurningurin varð settur fram, varð arbeitt við hesum spurninginum, og var tað tí torført at svara fyrr enn nú.

F.L.j.nr. 1530-4.

# 100-14. Fyrispurningur til løgmann, viðv. íløgum landstýrisins uttanlands.

Ár 1984, leygardagin 6. august boðaði løgtingsformaðurin frá fyrispurningi frá Erlendi Patursson til løgmans, sum var soljóðandi

**Fyrispurningur**

Nær ætlar løgmaður at geva marknaðarnevndini ta skrivligu frágreiðing viðvíkjandi íløgum landsstýrisins uttanlands, sum hann í apríl í vár gav lyfti um at veita nevndini?

21. februar varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

24. februar svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Erlendur Patursson, løgtingsmaður hevur sett fram soljóðandi fyrispurning til løgmann:

Nær ætlar løgmaður at geva marknaðarnevndini ta skrivligu frágreiðing viðvíkjandi íløgum landsstýrisins uttanlands, sum hann í aprfl í vár gav lyfti um at veita nevndini?

Til henda fyrispurningin kann eg svara, at frágreiðingin varð handað marknaðarnevndini tann 27. oktober 1983.

# 100-15. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann viðvíkjandi bergholsgerð ímillum Lopra og Sumba.

Ár 1984, mikudagin 22. februar boðaði løgtingsformaðurin frá fyrispurningi til Páll Vang, landsstýrismann frá Suðuroyar tingmonnum, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

1. Kann landsstýrismaðurin vátta, at neyðugur peningur er ella verður tøkur til byrjan av hergholsgerð ímillum Lopra og Sumba í komandi fíggjarári.
2. Kann landsstýrismaðurin vátta, at arbeiðið fer í gongd og at boriútgerðin, ið nýtt verður ímillum Gøru og Lorvík, verður flutt til Suðuroyar til nýtslu ímillum Lopra og Sumba, tá henda verður tøk um einar seks vikur.

**Viðmerkingar:**
Á bygdafundi í Sumba stutt eftir álvarsliga bilóhappið á Sumbiarvegnum í januar-ódnini var semja um at geva m.ø. landsstýrismanninum høvi til — innan ávísa tíð — at virka innan samgonguna fyri útvegan av fígging til bergholsgerðina, sum eigur at byrja fyrst í komandi fíggjarári.

Nú eru fýra vikur, til fíggjarlógin skal vera samtykt, og var tí gott at fingið upplýst, hvørji stig, landsstýrismaðurin hevur tikið til tess at fáa greitt hetta mál. Skulu stundir gevast, áðrenn fíggjarlógin verður samtykt, at meta um hvørt onnur politisk stig skulu takast, er nú neyðugt at frætta frá landsstýrinum um hesi viðurskifti.

Serliga kenna vit okkum ørkymlaðar av skriving løgmans um tørvandi tiltøk í hesum máli, og er hendan skriving tí lutvíst orsøk til fyrispurning okkara.

16. mars svaraði Páll Vang, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

*1. sp.* Kann landsstýrismaðurin vátta, at neyðugur peningur er ella verður tøkur til byrjan av bergholsgerð ímillum Lopra og Sumba fyrst í komandi fíggjarári.

*Svar:* Í grunninum berghol- og brúgvagerð eru umleið 23 mió. kr. tøkar. Av hesum 23 mió. kr. hevur landsstýrið í samband við uppskotið til fíggjarlóg fyri 1984-85 samtykt at avseta 16 mió. kr. til bergholsarbeiði millum Gøtu-Lorvík.

So statt eru um 7 mió. kr., sum kunnu nýtast til bergholsgerð aðra staðni í landinum.

Um byrjað varð at gera bergholið ímillum Lopra og Sumba í august í ár, vildi henda upphædd rokkið fíggjarárið út.

*2. sp.* Kann landsstýrismaðurin vátta, at arbeiðið fer í gongd og at boriútgerðin, ið nýtt verður ímillum Gøtu og Lorvík, verður flutt til Suðuroyar til nýtslu ímillum Lopra og Sumba, tá henda verður tøk um einar seks vikur.

*Svar:* Málið um hesa bergholsgerð var til endaliga viðgerð á landsstýrisfundi 15. mars í ár.

Skotið varð upp at nýta áðurnevndu 7 mió. kr. til bergholsgerðina til Sumbiar, og at arbeiðið skuldi byrja í august í ár.

Fyri hesum uppskoti vóru bert 2 atkvøður. So statt varð málið ikki samtykt.

Út frá hesum kann undirritaði ikki vegna landsstýrið vátta, at arbeiðað fer í gongd í hesum valskeiði.

# 100-16. Fyrispurningur til Paula Ellefsen, løgmann, viðvíkjandi fíggjan av svartkjaftavirkjum.

Ár 1984, týsdagin 6. mars boðaði løgtingsformaðurin frá fyrispurningi frá Peturi Renert, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

Nær og hvar hevur løgmaður havt fund við Egnsudviklingsfonden um fíggjan av ætlaðu svartkjaftavirkjunum í Gøtu og í Kollafirði, og hvørji projekt og hvørjar kostnaðarætlanir nýtti løgmaður undir hesum samráðingum?

Hví hevur løgmaður, hóast boðsendur, ikki enn verið á fundi í fíggjarnevndini um hetta mál?

**Viðmerkingar:**

Undir orðaskiftinum, tá tingmál nr. 55 var til 1. viðgerðar 21. februar 1983, varð spurt, hví einki enn var hent í spurninginum um fíggjan av ætlaðu svartkjaftavirkjum í Gøtu og Kollafirði. Spurningurin hevur nú verið til viðgerðar á tingi í langa tíð, og málið hevur livið óviðgjørt í fíggjarnevndini síðan 25. oktober í fjør.

Tá undirritaði undir áðurnevnda orðaskifti spurdi, hví einki varð hent í hesum máli, svaraði løgmaður, at «Egnsudviklingsfonden» ikki vildi lata pening til hetta endamál.

Fólkaflokksins limur í fíggjarnevndini, Óssur Dam Jacobsen, hevur áður sagt frá, at orsøkin til, at einki er hent í fíggjarætlanini í hesum máli, var tann, at løgmaður, sum var boðsendur at geva frágreiðing

í fíggjarnevndini um hetta mál enn ikki var møttur. Og eg loyvi mær ti at seta løgmanni hesar spurningar.

9. mars varð við 21-0 atkvøðum samtykt, at løgmaður skuldi svara fyrispurninginum.

26. mars svaraði løgmaður fyrispurninginum frá Peturi Reinert, løgtingsmanni soleiðis:

**Svar**

Tann 31. mai 1983 varð fundur hildin úti í Tinganesi. Møttir vóru stjórin fyri Egnsudviklingsdirektoratet, umboð fyri ríkisumboðið, ídnaðarráðgevin, umboð fyri nevndina í Dylluni í Kollafirði, ein fulltrúi í landsstýrinum og eg sjálvur.

Fundarevni var Dyllan í Kollafirði.

Projekt- og kostnaðarætlanartilfarið var »ajourført« og handað stjóranum í Egnsudviklingsdirektoratet ein ella tveir dagar frammanundan.

Tað skiltist týðiliga, at tað materialið, sum tá fyrilá um Dylluna, ikki kundi vera grundarlag fyri eini realitetsvurdering í Egnsudviklingsdirektoratet.

Tað er neyðugt at siga Peturi Reinert frá, at eg tá hevði lyndi til at vera samdur í hesi niðurstøðu, og at eg seinri eru fullkomiliga fullvísur í, at niðurstøðan er røtt.

Langt áðrenn umrødda fundin í Tinganesi hevði eg munnliga sagt frá, at ætlanin átti at minkast munandi, og at spurningurin um kanningar og royndir innan »surimiframleiðslu« og framleiðslu av »crab sticks« hevði landsstýrisins áhuga.

Hetta hava fyrireikararnir av Dylluprojektinum tikið til sín, og kann eg vísa til løgtingsmál nr. 82/1983 um veðhald fyri og tekning av partapeningi í P/f Blue North. Ætlanin er eisini at stuðla hesum projekti við stuðuli til ídnaðarfremjandi endamáli. Talan verður frá landsstýrisins síðu um munandi stuðul í mun til onnur projekt.

Orsøkin til áhuga landsstýrisins í hesum máli er fyri tað fyrsta útlitini fyri framleiðslu av »surimi« og »crab sticks«, og fyri tað næsta tørvin eftir størri vinnuligum aktiviteti í Norðurstreymoy.

Viðmerkjast kann, at landsstýrið hevur javnstillað svartkjaftavirkini í Kollafirði og Gøtu, tá spurningurin var um framleiðslu av svartkjafti til matna. Tá Dyllan var grundarlagið undir viðgerðini á

fundinum tann 31. mai 1983 var orsøkin bert tann, at taltilfarið frá Dylluni var nýggjari, og var handað stjóranum fyri Egnsudviklingsdirektoratinum stutt áðrenn fundin. Landsstýrið er vitandi um, at felagsskapurin í Gøtu arbeiðir við alternativum vinnutiltøkum.

Endaliga kann nevnast, at løgmaður fyri stuttum varð biðin um at koma á fund í fíggjarnevndini, eisini um hetta mál.

Tað lá fyri at møta til ta av fíggjarnevndini ynsktu tíð.

**Viðmerkingar:**
Við jøvnum millumbili frætta vit uttaneftir um vanlukkur av eldsbruna, veri tað seg á matstovum, gistingarhúsum, samkomuhøllum, dansistovum, skúlum, ellis- og røktarheimum, sjúkrahúsum, skrivstovubygningum, verkstøðum, -smiðjum o.s.fr.

Vit hoyra eisini um lívlát, ofta minni av brunaávum, enn tí ræðsla koma í, og fólk vórðu roykeitrað ella traðkað niður samantyrpt í trongum rýmingardurum.

Vánalig innrætting og brunatekniskt ósketni undir projektering og bygging eru oftast atvoldin til deyðsføll bæði í gomlum og nýggjum bygningum.

Hesin fyrispurningur er reistur til tess at binda um heilan fingur her hjá okkum heldur enn til at ræða. Hetst er tað eisini bíligari at tryggja bygningar undir nýinnrætting og projektering eftir felags reglugerð, enn eftir at slík reglugerð kemur í gildi um nøkur ár, sum áleggur myndugleikunum og eigarum at koma afturumaftur.

Nógv bygging fer fram í dag. Tilfarið er so ymiskt, at cingin hevur talið á byggievnum. Kanska einir 60.000 ymiskir komponentar verða nýttir um okkara leiðir. Tann tiðin er sostatt farin, tá ein dugnaligur handverkari kendi tey evni, hann arbeiddi við.

Bert at lita á brosjurur og evnislýsingar frá seljara og at brúka royndir uttaneftir er sum at geva fólki kókibók og so líta á, at tað er góður kokkur. Sjálvt væl lærdir verkfrøðingar og arkitektar hava ilt við at tolka vegleiðingar og eginleikar hjá teimum ymsu byggievnunum.

Tá størri bygningar verða bygdir her á landi, t.d. skúlar, stovnar og samkomuhús, hvussu verður farið fram brunatekniskt? Hvussu hevur verið atborið seinastu 10-15 árini? Hava landstýrið sum viðgerðandi og tingið sum játtandi myndugleiki havt fastar, felags og einsljóðandi reglur at ganga eftir, áðrenn játtað hevur verið?

Ein brunatrygdarreglugerð er eftir øllum at døma undir borði. Hesin spurningur er ætlaður at fregnast eftir, hvussu landsstýrið ætlar at tryggja fólk og verandi bygningar ímóti brunavanlukkum í millumbilinum, og at finna fram til, hvussu teir bygningar eru tryggjaðir, sum longu eru í nýtslu við nógvum fólki innandura bæði á degi sum á nátt.

27. mars 1984 svaraði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis:

# 100-17. Fyrispurningur til Tórbjørn Poulsen, landsstýrismann. Um trygdarreglur viðvíkjandi eldi v. m.

Ár 1984, mánadagin 12. mars boðaði tingformaðurin frá einum fyrispurningi frá Óla Breckmann, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

**Fyrispurningur**

1. Hvørjar brunatrygdarligar reglur hava verið og eru nú til taks at nýta, tá størri bygningar verða málsviðgjørdir av landsstýri ella stovnum tess?
2. Eitt liðugt uppskot um byggireglugerð var til skjals í 1975/76. Verður tað nýtt?
3. Hevur landsstýrið fingið ávíst vantandi brunatrygdarliga málsviðgerð av ávísum bygningum, sum landsstýrið hevur møguleika fyri at fáa ella átti at fingið sær vissu fyri, eru í lagi?
4. Hevur landsstýrið játtað loyvi og/ella fígging til bygningar, skúlar, bygdarhús v.m. uttan at vita, um teir lúka eitt brunatrygdarligt minstakrav?
5. Ætlar landsstýrið framyvir at játta fígging til bygningar, uttan einsljóðandi brunatrygdarligar treytir og eftirlit?
6. Ætlar landsstýrið at seta í verk trygdarliga málsviðgerð av serligum bygningum t.d. meðan mál kortini eru inni til eitt nú fíggjarliga viðgerð, solciðis at eins góðir og tryggir bygningar verða bygdir av tí almenna ella við almennari fígging.
7. Um ein kommuna, felag ella einstaklingar hava tað fyri neyðini, tá ætlanin er at byggja nýtt ella umvæla/innrætta gamalt, kunnu viðkomandi venda sær til landsstýrið at fáa fakliga vegleiðing í brunatrygdarligum spurningum.

**Svar**

1) Brunatrygdarligar reglur eru at finna í lóg frá 28. januar 1856 »angående Brandvæsenet i Thorshavn på Færøerne«, sum broytt við kunngerð nr. 21 frá 22. mars 1974, »Kgl. anordning« nr. 103 frá 13. august 1886 »indeholdende tillæg til Lov angaaende Brandvæsenet i Thorshavn på Færøerne af 28. januar 1856«, sum broytt við kunngerð nr. 21 frá 22. mars 1974 og í »Kgl. anordning« nr. 84 frá 16. juni 1882 »om Bygnings- og Brandvæsenet i de færøske Landkommuner«. Harumframt eru brunatrygdarligar reglur givnar í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um »býarskipanir og byggisamtyktir«, sum broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 24. mai 1974.

2) Um so er, at tað er landsbyggireglugerðin, hugsað verður um, so fyri liggur eitt uppskot til eina slíka frá landsverkfrøðinginum og eitt uppskot frá kommunufelagnum. Tað hevur ongantíð eydnast at samskipa hesi bæði uppskot til eina landsbyggireglugerð, sum partarnir kunnu semjast um.

3) Skal tað skiljast so, at spurt verður, um landsstýrið er gjørt vart við vantandi brunatrygdarliga málsviðgerð av ávísum bygningum, so er svarið noktandi. Hinvegin er okkurt dømi um, at landsstýrið er gjørt vart við, at bygningur ikki lýkur brunateknisk trygdarkrøv.

4) Tað man ivaleyst vera komið fyri, at landsstýrið hevur givið loyvi og játtað fígging til bygningar, sum ikki lúka brunatrygdarlig minstukrøv; men

5) tað er líka so vist, at landsstýrið fer at royna at umganga, at slíkt hendir.

6) Tann nevnd, sum sett varð í 1980 at endurskoða brunalóggávuna, lat í farnu viku landsstýrinum drúgvt álit við uppskoti um løgtingslóg um brunaviðurskifti v.m. Nevndin mælir m.a. til at seta á stovn brunaumsjón landsins at ráðgeva myndugleikum og øðrum í spurningum brunamálum viðvíkjandi. Álitið er nú til viðgerðar í landsstýrinum.

7) Landsstýrið sum so ímillum ikki konsulentvirksemi bygging viðvíkjandi, men ein ávís byggimálsviðgerð fer fram hjá landsverkfrøðinginum og í serligum føri í teknisku deild (arbeiðseftirlitinum). Tó hevur landsstýrið til tess at lætta um byggimálsviðgerðina eitt nú av ungdóms- og bygdahúsum latið gjørt tekningar at lata áhugaðum.

F.L.j.nr. 816-9.

# 100-18. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann, viðvíkjandi setan av einum lækna aftrat í Eysturoynni.

Ár 1984, fríggjadagin 9. mars boðaði løgtingsformaðurin frá einum fyrispurningi frá Jørgen Thomsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

**Fyrispurningur**

Fer landsstýrið í hesari tingsetuni at fremja uppskot um at seta ein lækna aftrat í Eysturoynni?

**Viðmerkingar:**
Landsstýrið hevur fyri meira enn trimum árum síðani fingið áheitan úr Eysturoynni um at seta ein kommunulækna aftrat.

Í 1974 var eitt umfatandi álit lagt fyri tingið viðvíkjandi kommunulæknaviðurskiftunum í Føroyum.

Hetta mundi fyri ein part vera avleiðing av teimum sera ótryggu viðurskiftunum, sum valdaðu fram í sjeytiárini, tí torført var at fáa fólk til tey læknastørv, sum tá vóru.

Henda støða er tíbetur broytt og vit hava ongantið strið av at læknar ikki fáast. Nú er støðan heldur øvugt.

Á ólavsøku 1975 legði sosiala nevnd tingsins fram álit, sum var ein úrskurður burturúr tí drúgva álitinum, sum í tingsetuni frammanundan var løgd fyri tingið. Tá samtykti tingið at talið av føstum kommunulæknastørvum skuldi vera 23. Hetta mettu menn tá vera hóskandi.

Nú 9 ár eru liðin síðani henda skipan varð gjørd, kenna vit royndirnar av teimum ábótum, sum síðan hava verið gjørdar so við og við.

Í tingálitinum frá august 1975 verður m.a. sagt:

»Sosiala nevndin er samd í, at kommunulæknatalið kemur at verða 23. Tó kann nevndin ikki taka endaliga støðu, hvar læknarnir skulu búgva. Stórt sæð kunnu læknadømini skipast sum skotið upp í álitinum, men tað kann vera, at okkurt skal broytast undir fremjingini av nýskipanini. Til dømis heldur nevndin, at tann eini kommunulæknin, sum kemur aftrat í Eysturoynni, meira hóskandi kundi búð í Gøtu, heldur enn at ein afturat kemur at búgva í Runavík.«

Sum tað sæst av viðløgdu talvu, so eru tað tvey læknadømi í Eysturoy, sum hava hægsta fólkatalið uppá hvønn læknan, tá Havnin ikki er tikin við. Fuglafjarðar læknadømi, sum er bygdirnar: Fuglafjørður, Leirvík og Oyndarfjørður, hava 2557 fólk uppá hvønn læknan og Skála læknadømi, sum er: Skáli, Strendur, Elduvík og Gøta hava 2561 fólk uppá læknan. Viðmerkjast skal, at hesi tøl eftir talvuni eru frá 1980.

Tað er júst frá hesum økjum, umsókn varð send landsstýrinum 7. januar 1981 við áheitan um at seta ein lækna aftrat. Nevnast kann, at á Bornholm eru 33 læknar við 1433 fólkum til hvønn læknan. Íbúgvaratalið á Bornholm er 47.313. Eftir galdandi skipan er fasta gjaldið til kommunulæknarnar umleið kr. 80.000,-. Soleiðis sundurgreinað:

| | |
|---|---|
| Ríkiskassin | kr. 40.000,- |
| Landskassin | - 20.000,- |
| Kommunan | - 20.000,- |

Umframt verða goldnar ferðaútreiðslur av statinum.

Íbúgvar pr. kommunulækna eftir fólkatalinum 1/1-1980.

| Læknadømir | Fólkatal | Fólk pr. lækna | Læknar |
|---|---|---|---|
| Norðoyggjarnar | 5811 | 1937 | 3 |
| Fuglafjørður | 2547 | 2547 | 1 |
| Nes sókn, Runavík/Toftir | 3223 | 1611 | 2 |
| Skála | 2561 | 2561 | 1 |
| Eiði | 2143 | 2143 | 1 |
| Kollafjørður | 1288 | 1288 | 1 |
| Vestmanna | 1295 | 1295 | 1 |
| Vágarnar | 2882 | 1441 | 2 |
| Suðurstreymoy, Tórshavn | 14.471 | 2884 | 5 |
| Sandoy | 1750 | 1750 | 1 |
| Suðuroy, norð | 3130 | 1565 | 2 |
| Suðuroy, suður | 2766 | 1383 | 2 |

| | | |
|---|---|---|
| Fuglafjarðar læknadømi: | Fuglafjørð | 1603 |
| | Leirvík | 750 |
| | Oyndarfjørð | 194 |
| | | 2557 |

| | | |
|---|---|---|
| Skála læknadømi: | Skála | 659 |
| | Strendur | 887 |
| | Elduvík | 123 |
| | Gøta | 892 |
| | | 2561 |

Eftir at ein lækni er settur afturat:

| | |
|---|---|
| Fuglafjørð/Oyndarfjørð: | 1603 + 192 : 1795/fólk/lækna |
| Gøta/Leirvík: | 750 + 892 : 1642/fólk/lækna |
| Skáli/Sjóvar/ Elduvík: | 659 + 887 + 123 : 1669 fólk/lækna |

Argument: 1. Geografisk eind
2. Stóran belastniug í vaktunum vegna tað, at læknin skal taka allar skaðatilburðir fyrst. Nógv koyring í vaktunum.

Tabel XI. *Læger, indbyggere og tilmeldte gruppe I-sikrede fordelt på amter.*

| | Antal læger | Indbyggere | | Tilmeldte gr. I-sikrede | |
|---|---|---|---|---|---|
| | i alt | I alt | Gennemsnit pr. læge | I alt | Gennemsnit pr. læge |
| *31.XII. 1982:* | | *(1/1 1983)* | | | |
| København, Frederiksberg og Amager | 330 | 628.564 | 1905 | 486.220 | 1473 |
| Øvrige land | 2516 | 4.187.900 | 1784 | 3.296.747 | 1310 |
| Heraf: København's amt | 312 | 566.125 | 1815 | 394.520 | 1264 |
| Frederiksborg amt | 179 | 331.349 | 1851 | 230.057 | 1285 |
| Roskilde amt | 110 | 205.484 | 1867 | 142.898 | 1293 |
| Vestsjællands amt | 156 | 277.934 | 1782 | 208.157 | 1334 |
| Storstrøms amt | 144 | 258.670 | 1796 | 194.919 | 1354 |
| Bornholms amt | 33 | 47.313 | 1434 | 36.793 | 1115 |
| Fyns amt | 259 | 453.773 | 1752 | 343.562 | 1326 |
| Sønderjyllands amt | 141 | 249.970 | 1773 | 183.949 | 1305 |
| Ribe amt | 121 | 214.700 | 1774 | 160.394 | 1326 |
| Vejle amt | 178 | 327.102 | 1838 | 242.898 | 1365 |
| Ringkøbing amt | 150 | 264.103 | 1761 | 195.381 | 1303 |
| Århus amt | 324 | 578.149 | 1784 | 426.139 | 1315 |
| Viborg amt | 134 | 230.909 | 1723 | 174.416 | 1302 |
| Nordjyllands amt | 275 | 482.409 | 1754 | 363.366 | 1321 |
| Hele landet 31.XII.1982 | 2846 | 5.116.464 | 1798 | 3.782.970 | 1329 |
| Heraf: Enkeltmandspraksis | 1065 | - | — | 1.418.400 | 1332 |
| I kompagniskabspraksis | 1344 | — | — | 1.744.574 | 1298 |
| I samarbejdspraksis | 437 | — | — | 620.023 | 1419 |
| *31.XII.1981:* | | *(1/1 1982)* | | | |
| København, Frederiksberg og Amager | 338 | 632.578 | 1929 | 483.957 | 1475 |
| Øvrige land | 2465 | 4.486.577 | 1835 | 3.250.641 | 1330 |
| Hele landet 31.XII.1981 | 2793 | 5.119.155 | 1846 | 3.734.599 | 1347 |
| Heraf: Enkeltmandspraksis | 1062 | — | — | 1.436.929 | 1353 |
| I kompagniskabspraksis | 1292 | — | — | 1.691.952 | 1310 |
| I samarbejdspraksis | 419 | — | — | 605.718 | 1446 |
| *31.XII.1980:* | | *(1/1 1981)* | | | |
| København, Frederiksberg og Amager | 326 | 636.150 | 1951 | 480.574 | 1474 |
| Øvrige land | 2420 | 4.487.839 | 1854 | 3.206.551 | 1325 |
| Hele landet 31.XII.1980 | 2746 | 5.123.989 | 1866 | 3.687.125 | 1343 |
| Heraf: Enkeltmandspraksis | 1067 | — | — | 1.449.453 | 1358 |
| I kompagniskabspraksis | 1275 | — | — | 1.664.366 | 1305 |
| I samarbejdspraksis | 404 | — | — | 573.306 | 1419 |
| *31.XII. 1979:* | | *(1/1 1980)* | | | |
| København, Frederiksberg og Amager | 327 | 641.991 | 1963 | 481.341 | 1472 |
| Øvrige land | 2386 | 4.481.074 | 1878 | 3.159.981 | 1324 |
| Hele landet 31.XII.1979 | 2713 | 5.122.065 | 1888 | 3.641.322 | 1342 |
| Heraf: Enkeltmandspraksis | 1054 | — | — | 1.437.206 | 1364 |
| I kompagniskabspraksis | 1260 | — | — | 1.635.373 | 1298 |
| I samarbejdspraksis | 399 | — | — | 568.743 | 1425 |
| *31.XII.1978:* | | *(1/1 1979)* | | | |
| København, Frederiksberg og Amager | 325 | 660.985 | 2000 | 478.694 | 1473 |
| Øvrige land | 2343 | 4.425.934 | 1904 | 3.107.310 | 1326 |
| Hele landet 31.XII.1978 | 2668 | 5.111.534 | 1916 | 3.586.024 | 1344 |
| Heraf: Enkeltmandspraksis | 1042 | | — | 1.423.576 | 1366 |
| I kompagniskabspraksis | 1218 | — | — | 1.578.143 | 1296 |
| I samarbejdspraksis | 408 | — | — | 584.305 | 1432 |
| *31.XII.1977:* | | *(1/1 1978)* | | | |
| København, Frederiksberg og Amager | 325 | 661.985 | 2036 | 479.024 | 1474 |
| Øvrige land | 2304 | 4.425.874 | 1925 | 3.054.869 | 1326 |
| Hele landet 31.XII.1977 | 2629 | 5.086.959 | 1939 | 3.533.893 | 1344 |
| Heraf: Enkeltmandspraksis | 1059 | | — | 1.455.956 | 1375 |
| I kompagniskabspraksis | 1168 | | — | 1.506.091 | 1289 |
| I samarbejdspraksis | 402 | | | 571.846 | 1423 |

12. mars varð við 17-0 atkvøðum samtykt, at Páll Vang skuldi svara fyrispurninginum.

16. mars svaraði Páll Vang, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis

**Svar**

Landsstýrið hevur samtykt at seta ein lækna afturat í Eysturoynni.

Umsókn varð send innanríkisráðnum, og í skrivi dagfest 2. mars 1984 hevur ráðið góðtikið, at ein lækni verður settur afturat í Eysturoynni við tilknýti til Gøtu-, Lorvíkar- og Fuglafjarðar kommunur.

Málið verður síðani sent donsku fíggjarnevndini til góðkenningar.

Tá endalig tilsøgn fyriliggur verður starvið sett.

F.L.j. nr. 913-7-24.

# 100-19. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann, viðvíkjandi avloysingarskipan í Sandoyar læknadømi.

Ár 1984, fríggjadagin 9. mars boðaði løgtingsformaðurin frá einum fyrispurningi frá Tórálvi Mohr Olsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

**Fyrispurningur**

Arbeiðir landsstýrið framvegis við eini amanuensisskipan — avloysingarskipan — fyri Sandoyar læknadømi, samstundis sum tingmálið frá Javnaðarflokkinum um setan av tveimum læknum í Sandoyar læknadømi enn ikki er avgreitt?

**Viðmerkingar:**
5. december 1983 legði Føroya Javnaðarflokkur fram tingmál nr. 29/1983: Broyting í kommunulæknaskipanini.

9. december 1983 varð 1. viðgerð av málinum um setan av einum lækna aftrat í Sandoyar læknadømi.

Hetta, sum er einasta trygga loysnin av læknamálinum í Sandoyar læknadømi.

Undir viðgerðini í tinginum upplýsti Páll Vang, landsstýrismaður, at landsstýrið hevði arbeitt við einari amanuensisskipan (avloysingarskipan) — í samband við læknarnar í Suðurstreymi, men hetta vísti seg ikki møguligt, segði landsstýrismaðurin.

10. januar 1984 — sama dag sum fólkatingsvalið var — stóð við stórum stavum á forsíðu Dimmalættingar, at læknamálið í Sandoyar læknadømi *var loyst*, við tað at fólkatingsmaðurin Johs. Martin

Olsen í samráð við Brittu Schall Holberg, innanríkisráðharra, hevði funnið fram til eina amanuensisskipan (avloysingarskipan).

Tá tað tykist ikki at røkjast fyri, at tingmál nr. 29/1983: Broyting í kommunulæknaskipanini, verður avgreitt frá sosialu nevndini í bræði, loyvi eg mær at spyrja landsstýrismannin um, hvat hent er í hesum fyri Sandoyar læknadømi so týðandi máli.

12. mars varð við 17-0 atkvøðum samtykt, at Páll Vang, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurninginum.

20. mars varð fyrispurningurin svaraður av Páll Vang, landsstýrismanni.

**Svar**

Landsstýrið søkti í mars 1983 innanríkisráðið um, at nýta 6. kommunulæknaembætið í Suður-Streymoy sum eitt amanuensisstarv, eftir góðkenning frá løgtingsins fíggjarnevnd.

Samstundis varð biðið um loyvi til, at hetta starv skuldi vera í fastari vaktarskipan við læknastarvið í Sandoyar læknadømi, soleiðis at teir læknar, ið koma at starvast í amanuensisskipanini koma at hava læknavakt á Sandoynni.

Í skrivi dagfest 2. mars 1984 frá innanríkisráðnum er umrødda umsókn góðkend.

So statt verður í løtuni arbeitt við at fáa sett hesa skipan í verk.

Henda skipan er at skilja sum ein fyribils loysn.

F.L.j.nr. 913-7-1.

# 100-20. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann. Viðvíkjandi samferðsluviðurskiftum um Vestmannasund.

Ár 1984, mánadagin 12. mars boðaði løgtingsformaðurin frá einum fyrispurningi frá Ivan Johannesen og Svend Age Ellefsen. Fyrispurningurin var soljóðandi

**Fyrispurningur**

Nú tað er alment komið fram í bløðunum, at landsstýrið hevur samtykt, at ferjulegan í Vestmanna skal flytast inn á Fjørð, verður heitt á landsstýrismannin um at svara fylgjandi spurningum:

1. Hevur landsstýrið gjørt ta kanning, sum løgtingið álegði landsstýrinum í løgtingsmáli nr. 101/1982: Hvat rætta loysnin er fyri framtíðarferðasambandið millum Vágarnar og Streymoynna, og hvat kostnaðurin kann metast til.
2. Um punkt 1 er játtandi, hvussu umfatandi er henda kanning gjørd?
3. Hvat verður kostnaðurin fyri landskassan av tí projekti, ið er víst fram í bløðunum í samband við at flýta ferjuleguna inn á Fjørð.

Annars verður biðið um svar upp á spurningarnar í løgtingsmáli nr. 101/1982, spurningar nr. 1-6.

1. Flyta ferjuleguna í Vestmanna inn á Fjørð og keypa nýggja ferju.
2. Leggja ferjuleguna við Norðaru gjógv og nýta somu ferju.
3. Byrging um Vestmannasund uttan siglingarrennu.
4. Byrging um Vestmannasund við siglingarrennu.
5. Heingibrúgv um Vestmannasund.
6. Tunnil undir Vestmannasundi.

Atkvøðugreiðsla 12. mars. Samtykt varð við 27-0 atkvøðum, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

6. apríl 1984 svaraði Páll Vang, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Spurningur Ivans Johannesens snýr seg um ferðasambandið millum Vágarnar og Streymoynna og býtir seg í 3 partar:

1. Um landsstýrið hevur gjørt ta kanning, sum løgtingið álegði landsstýrinum í løgtingsmáli nr. 101/1982: Hvat er rætta loysnin fyri framtíðarferðasambandið millum Vágarnar og Streymoynna, og hvat íð kostnaðurin kann metast til?

2. Um punkt 1 er játtandi, hvussu umfatandi er henda kanning gjørd?

3. Hvat verður kostnaðurin fyri landskassan av tí projekti, ið er víst fram í bløðunum í sambandi við at flyta ferjuleguna inn á Fjørð.

Til fyrsta og annan spurningin er at siga, at heilt leyslig projekt eru gjørd fyri allar møguleikarnar, so ein hevur fingið eina hylling á, hvørjar tilfarsnøgdirnar eru, sum skulu til, og hvat arbeiði skal leggjast í verkið, og er úrslitið blivið, at teir seinastu 4 av møguleikunum, nevndir eru:

1. Flyta ferjuleguna í Vestmanna inn á Fjørð og keypa nýggja ferju.
2. Leggja ferjuleguna við Norðaru gjógv og nýta somu ferju.
3. Byrging um Vestmannasund uttan siglingarrennu.
4. Byrging um Vestmannasund við siglingarrennu.
5. Heingibrúgv um Vestmannasund.
6. Tunnil undir Vestmannasund.

Kosta 250-300 mió. kr., og onkur fer helst upp um tær 300 mió. kr.

Landsstýrið hevur hildið tílíkar útreiðslur vera so stórar í mun til okkara fíggjarorku, at ikki varð grund til í løtuni at fara undir tær umfatandi, kostnaðarmiklu og tíðarkrevjandi kanningar, sum mega gerast, áðrenn endalig støða kann takast.

So eru tað teir báðir fyrst nevndu møguleikarnir: 1. At flyta ferjuleguna inn á Fjørð og 2. At byggja ferjulegu við Norðaru gjógv í Kvívíkar kommunu. Byggingin av hesi seinru kostar í minsta lagi 2-3 ferðir so nógv sum hin fyrra, og óvist er hvussu væl, hon fer at roynast.

Kostnaðurin av at flyta ferjuleguna inn á Fjørð verður í útreiðslum til havnabygging einar 10 unió. kr. og til landsvegagerð og ferjubrúgv við útgerð einar 6 mió. kr., t.e. tilsamans einar 16 mió. kr.

Samanumtikið er støðan hon, at deils er ferjulegan síðan seinastu útbygging av Vestmanna havn til rættuligt fortrð, har hon nú er, deils er ein flyting inn á Fjørð nógv tann bíligara og tryggara loysnin, og deils hevur hetta samband, síðan tað varð føst ruta um sundið verið røkt frá Vestmanna.

Út frá tí, at í løtuni tala bæði fíggjarligar og tekniskar metingar fyri, at ferjulegan verður verandi inni á Vestmanna, hevur landsstýrið tikið støðu.

F.L.j.nr. 1817-57.

---

# 100-21. Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann. Um vatnorkuútbygging.

Ár 1984, mánadagin 12. mars boðaði formaðurin frá einum fyrispurningi frá Peturi Reinert, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

1) Finnast viðmerkingar frá A/S A.B. Berdal til vatnorkuútbyggingarprojektið hjá Højgaard & Schultz í Føroyum, sum eru av nýggjari dato enn 20. juli 1981?
2. Hevur SEV undirskrivaðbindandi sáttmála við Højgaard & Schultz um vatnorkuútbyggingina í Eysturoy?

Tá orkuspurningurin var til viðgerðar á tingi kom fram, at norskt felag A/s A.B.Bredal hevði gjørt viðmerkingar eftir áheitan orkuráðsins til projektið hjá Højgaard & Schultz yvir útbyggingina av vatnorkuni í Føroyum.

Áðurnevnda álit frá A.B.Berdal frá 23.9.1980 varð saman við øðrum tilfari býtt út til tingmenn, sum aftur nýttu samlaða tilfarið sum grundarlag undir teirri viðgerð, sum var í tinginum.

Millum tilfarið var eisini ein »revideret redegørelse« frá Højgaard & Schultz dagf. 20.7.1981, har H.& S. eisini hava ávísar viðmerkingar til álitið frá A.B.Bredal.

Seinni er komið fram, at nýggjar viðmerkingar eru komnar frá A.B.Bredal til áðurnevnda »revideret redegørelse« frá H.& S. dagf. 20.7.1981. Hetta seinast nevnda tilfarið er ongantíð komið tingmonnum ella almenningi til kunnleika og verður tí fyrsti spurningur reistur.

Eisini er komið fram, at SEV longu hevur gjørt bindandi sáttmála við Højgaard og Shultz um vatnorkuútbyggingina í Eysturoy
Tí verður hesir spurningar settir landsstýrismanninum í orkumálum.

13. mars varð við 27-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

30. mars svaraði Lilif Samuelsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Til fyrra spurningin er at siga, at Orkuráðið hevur móttikið bræv frá A/S A.B.Berdal aftan á nevnda dato, og er hetta brævið í millum tað tilfar, ið Orkuráðið hevur bygt sitt ummæli á.

Ummælið var sent Føroya Landsstýri við fylgiskrivi dagfest 15. februar 1982.

Til seinna spurningin um sáttmálan við Højgaard & Schultz er at siga, at spurningurin er lagdur fyri SEV, sum hevur givið soljóðandi frágreiðing:

»Spurningurin um framhaldandi vatnorkuútbygging varð reistur av nýggjum á umboðsfundi hjá S.E.V. á vári 1978 og álagt varð stýrinum at halda fram við kanningum av vatnorkuútbyggingarmøguleikunum.

Í skrivi dagfest 19.07.1978 biður S.E.V. um samráðingar við Landsstýrið um fíggjarviðurskiftini og um neyðuga hjálp frá landsverkfrøðinginum. Fundurin var hildin tann 16. august 1978 og møttu umframt stýrið eisini Hjalgrím Winther, Mikkjal Helmsdal og Hanus Joensen og fyri landsstýrið Atli Dam, løgmaður og landsstýrismenninir Petur Reinert, D.P.Danielsen og Jákup Lindenskov. Semja var um, at landsverkfrøðingurin skuldi verða S.E.V. til hjálpar í tann mun tað kundi lata seg gera. Avgjørt var eisini at senda nevnd til Danmarkar at samráðast við Højgård og Schultz um vatnorkuútbyggingina. Við í nevndini vóru Asbjørn Joensen, stýrisformaður, Hjalgrím Winther, stjóri og Mikkjal Helmsdal, landsverkfrøðingur.

Á stýrisfundi sama ár er semja um, eftir tilmæli frá nevndini, at heita á Højgaard og Schultz at gera skitsuprojekt til vatnorkuútbyggingina í Eysturoy, Streymoy og Vágoy. Skitsuprojektini vóru løgd fyri umboðsnevndina á vári 1979 og samtykt við avgjørdum meiriluta.

Spurningurin, um hvør skuldi gera arbeiðið, varð eisini nógv um-

røddur á fundinum. Við teimum góðu royndum S.E.V. hevði frá útbyggingini í Vestmanna, kundi stýrið taka undir við, at Højgård og Schultz fekk arbeiðið. S.E.V. legði dent á, at hetta er fíggjarlig sterk fyritøka og tí før fyri at átaka sær arbeiðið sum høvuðsentreprenørur. Hetta hevur eisini stóran týdning, tá fígging skal fáast til vega. Skuldi arbeiðið verið býtt sundur og boðið út, hevði hetta kravt stórt eftirlit og drúgva tíð. Eisini hevði verið neyðugt at detailprojektera áðrenn byrjast kundi. Nevnast skal, at treytin fyri samarbeiðið við Højgaard og Shultz var, at mest møguligt arbeiði skuldi verða á føroyskum hondum.

Við nevndu fyritreytum undirskrivaði S.E.V. »overenskomst« við Højgaard & Shultz.«

Leggjast kann aftrat, at landsstýrið hevur havt fundir, har m.o. umboð fyri S.E.V., Orkuráðið, Højgaard & Schultz og landsverkfrøðingurin hava verið við.

Landsstýrið hevur gjørt greitt, at landsstýrisins støða er, at bæði hvat ið viðvíkur projektering, entreprisum og fremjing av arbeiðum skal so nógv sum møguligt gerast av føroyingum sjálvum.

# 100-22. Fyrispurningur til Anfinn Kallsberg, landsstýrismann. Viðvíkjandi bussleiðum í Suðuroy.

Ár 1984, týsdagin 23. mars boðaði formaðurin frá einum fyrispurningi frá Ova Mikkelsen, løgtingsmanni sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

1. Nú bussleiðir skulu byrja almenna rutukoyring í Suðuroynni í mai mánaði í ár, er tað so ætlanin, at rutan bert skal hava eitt fast stoppistað í hvørjari bygd, kanska 2 í teim størru bygdunum?
2. Um so er, ætlar tað almenna so at byggja innilokaðar terminalar, innilokað bíðihús — á hesum føstu stoppistøðum, nú áðrenn bussleiðin fer at koyra?
3. Um spurningur nr. 1 er svaraður játtandi, so verður hendan almenna rutukoyring at hava munandi verri service, enn tann privata hevur í dag, eins og hetta almenna tiltak ger, at tað yvirhøvur verður dupult so dýrt at koyra við rutuni enn tað var áður, tá ein nú fyrst skal koyra til terminalin — stoppistaðið. Vil og kann landsstýrið bera so í bandi, at servican ikki verður verri, enn hon er við at ein — sum higartil — kann bíleggja pláss í rutuni dagin fyri og verður avheintaður við hús, eins og hann verður avsettur við hús á heimferð?

**Viðmerkingar:**

Sum rutukoyringin higartil hevur verið, so hevur hon sum heild verið væl røkt og givið ferðafólkunum sera góða service, m.a. við at ferðafólk hava verið heintað og avsett við teirra bústað við hús.

Sjálvandi fegnast allir suðuroyingar um, at tað almenna nú fer at seta munandi fleiri túrar inn í koyringina, soleiðis at lættari og oftari slepst aftur og fram í millum bygdir, m.a. til og frá sjúkrahúsinum

uttan at bíða tað mesta av degnum fyri at sleppa heim aftur. Men um hetta skal viðføra, at hendan almenna rutan bert steðgar við eitt ella tvey føst stoppistøð, so er lítið vunnið, ja servican verður munandi verri enn hon er.

Av fólkum, ið ferðast við rutuni, fara tey flestu til og frá »Smyrli« og hava aloftast nakað væl av viðføri við sær — eins og ofta smábørn. Næststørsti bólkur er sjálvandi skúlabørn og frá ávísum bygdum arbeiðsfólk til tær størru bygdirnar, men harnæst eru tað sjúklingar, ið skulu til sjúkrahúsið til kanningar ella ambulantar viðgerðir, eins og vitjandi til sjúkrahúsið.

Sum dømi kann nevnast, at »Smyril« siglir av Tvøroyri kl. 7, hvussu hevur landsstýrið so hugsað sær, at hesi ferðafólk til »Smiril« skulu koma til bussstoppistaðið kl. hálvgumseks á morgni — ganga í myrkri og vátveðri, fyri ikki at tala um í kava, kanska við fleiri kuffertum, koyggjusekki og øðrum, ella við smábørnum. Fitt nú eru fáir hýruvognar í Suðuroy, so um nakar fæst í teim flestu bygdunum, er tað sjálvandi ógjørligt at fáa ein so tíðliga á morgni, og skuldi tað eydnast, so er ferðin dýrkað við minst 30 kr.

Skulu so hesi fólkini standa úti á vegnum og bíða í vátum og illfýsnum veðri og verða á kroppi, áðrenn tey sleppa upp í ein kaldan buss. Sjálvt um fleiri hýruvognar eru tøkir, kunnu ikki øll koma fram í senn.

Og hvat, tá »Smyril« fer av Havnini sunnukvøld til Suðuroyar kl. 23.15 — tó sum vant munandi seinri — og ein endar á Tvøroyrar kai kl. tvey ella hálvgumtrý mánamorhum. Tað er ein langur teinur at ganga av Tvøroyra kai og til Froðbiar ella inn í líðina, sjálvt um ein er leysur, og hvana tyngri við fleiri kuffertum fatlað á bakinum, tí sjálvandi fær ein ikki fatur á hýruvogni hesa tíð á nátt. Tað hevur so ikki eydnast higartil.

Tí er tað eitt krav, at nú tað almenna fær monopol upp á rutukoyring í Suðuroy, at servisan ikki verður verri, ella at koyringin eisini krevur hýruvognskoyring.

Sjálvandi fegnast vit øll um, at nú fæst betri og oftari samband millum bygdir í oynni, sum nevnt áður, men sama almenna rutukoyringsprinsipp, sum er vælhóskandi í Keypmannahavn ella London, hóskar nú einaferð ikki í Suðurou.

Í Havnini er eisini øðrvísið, tá har skulu fólk bert flytast til og frá arbeiði ella til og frá skúla, og eru hesi fólk tí leyshent, meðan ferðafólk til og frá »Smyrli« í Suðuroy altíð hava meir og minni av viðføri við sær, og sostatt loyvi eg mær at seta landsstýrismanninum, sum hevur bussleiðir um hendi, hesar spurningar.

23. mars varð við 21-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

11. apríl svaraði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis

**Svar**

1. Tað er ætlanin, at rutan skal hava føst steðgipláss í hvørjari bygd. Talið verður frá 1 til 6-7, alt eftir støddini á bygdunum. afturat hesum verður møguligt at steðga bussinum aðrastaðni á farleiðini.

2. Ætlanin er, at »Bygdalciðir« skal byrja almenna rutukoyring í Suðuroy í mai mánaði.

   Til ta tí verður ikki bygd innilokað bíðirúm ella terminalar. Til tess er tíðin ov stutt.

   Samráðingar eru í løtuni millum »Bygdaleiðir« og landsverkfrøðingin um, hvussu skal farast fram viðvíkjandi bygging av skýlum.

   Bíðað verður eftir úrsliti av hesum samráðingum.

3. Tað hevur sjálvandi ikki verið ætlanin, nú »Bygdaleiðir« skulu byrja almenna rutukoyring í Suðuroynni, at lækka tænastustigið. Tænastustig er ikki bert at steðga við hvørt hús, tað er eisini at fáa fleiri túrar inn í koyringina, solciðis at lættari og oftari slepst aftur og fram ímillum bygdir, m.a. til og frá sjúkrahúsinum uttan at bíða tað mesta av degnum fyri at sleppa heim aftur, sum spyrjarin tekur til í viðmerkingunum til spurningin. Tænastustig er eisini, at rutan koyrir tíðarrætt og beinleiðis, og t.d. hvussu komforturin í bussinum er. Ringt er at sammeta hesi frammanfyri nevndu tænastukrøv og ikki kunnu tey øll samskipast.

   Men sum heild er tað landsstýrisins meting, at úrslitið av tí stóra arbeiði, sum er lagt í at gera eina samskipaða rutukoyring fyri alla Suðuroynna, fer at geva suðuroyingum eina trygga, vælútbygda rutuskipan á einum hægri tænastustigi enn higartil.

F.L.j.nr. 1805-41-1.

# 100-23. Fyrispurningur til Tórbjørn Poulsen, landsstýrismann.

Ár 1984, mikudagin 21. mars boðaði tingformaðurin frá einum fyrispurningi frá Hilmar Bech, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

1. Hvussu langt er landsstýrið komið við fyrireikingum til tess at útvega Útvarpi Føroya nýggj senditól, ið kunnu bøta eum eitt nú hoyrilíkindini hjá okkara sjómonnum?
2. Nær kann roknast við, at slík tól verða sett upp og tikin í nýtslu?

**Viðmerkingar:**
Í december 1982 var eitt uppskot til viðgerðar í løgtinginum, sum bar í sær, at løgtingið álegði landsstýrinum beinanvegin at gera neyðugar fyrireikingar til uppsetan av nýggjum, sterkari sendara á millumbylgju til Útvarp Føroya, og at hetta arbeiðið varð sett í gongd sum skjótast.

Málið fekk ikki meiriluta á løgtingi, og umboðini fyri samgongufloKkarnar í fíggjarnevndini upplýstu í teirra áliti, at landsstýrið arbeiddi við málinum, og at peningur var avsettur á fíggjarlógini 1983/84 til endamálið, og at teir tí ikki tóku undir við uppskotinum.

Støðan er framvegis tann, at fiski- og útróðrarmenn, sum fyrr hava sent áheitan til tingið um at fáa bøtt um hoyriviðurskiftini, framvegis ikki hoyra útvarpið, tá teir koma eitt sindur frá landi, og tí verður hesin fyrispurningur borin fram fyri at fáa greiðu á, hvussu langt landsstýrið er komið við arbeiðinum til at seta upp ein sterkari millumbylgjusendara, sum kann tryggja okkara sjómonnum betri hoyrilíkindi.

23. mars varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

10. apríl 1984 svaraði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

1. Sum áður greitt tinginum frá, hevur framhaldandi arbeiði við millumbylgjusendistøðini á Skúvanesi steðgað eftir neyðugari játtan frá tinginum.

   Við teirri upphædd, sum sambært júst samtyktu fíggjarløgtingslóg nú er tøk í grunninum til útvarpssendistøð 7 milj. kr., fer landsstýrið beinanvegin at venda sær til Telefonverkið um at fáa til vega ta neyðugu útgerð, sum setast skal á Skúvanes.
2. Roknast kann við, at útgerðin kann verða sett upp og tikin í nýtslu næsta summar.

---

# 100-24. Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann viðvíkjandi vatnorkuútbygging.

Ár 1984, mikudagin 21. mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Óla Breckmann, løgtingsmanni:

**Fyrispurningur**

Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvat fór fram á fundi í Havn fríggjadagin 16. mars 1984, millum umboð sambandsfloksins í landsstýrinum, umboð fyri SEV, landsverkfrøðingsstovnin og danska byggifelagið Højgaard & Schultz.

**Viðmerkingar:**
Av tí at einki er frætt av nevnda fundi, og av tí at málið um vatnorkuútbyggingina hevur stóran almennan týdning og áhuga, ynskir undirritaði eina frágreiðing um, hvat fram er farið, og hvørja støðu landsstýrið hevur til málið sum tað nú stendur, og hvussu landsstýrið hugsar sær, at henda útbygging verður framd.

23. mars varð við 18-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

30. mars svaraði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Viðvíkjandi fyrispurninginum um, hvat ið fór fram á fundi í Havn fríggjadagin 16. mars 1984 er at siga, at:

Landsstýrið hevði frætt, at umboð fyri Højgaard & Schultz í teimum døgum høvdu samráðingar við SEV um viðurskifti í samband við vatnmegiútbyggingina.

Løgmaður bað Ivan Johannesen, løgtingsmann, sum eisini er formaður fyri SEV-stýrið, um at heilsa og siga, at løgmaður fegin vildi nýta høvið at heilsa upp á teir úti í Tinganesi.

Tann óformella receptiónin, har løgmaður sum vanligur siður er við slík høvi, beyð upp á eitt glas av Sherry ella Sisu og eitt stykki av kransakøku, var hildin fríggjadagin 16 mars 1984, og tala varð um leyst og fast, soleiðis sum vanligt er undir sovorðnum umstøðum.

Eyðsað er, at komið er eisini inn á spurningar í samband við ætlaðu vatnorkuútbyggingina, men eftir sum hetta var ein óformell samkoma, var ikki talan um nakrar samráðingar.

# 100-25. Fyrispurningur til Tórbjørn Poulsen, landsstýrismann viðv. innlating av kommunalum roknskapum.

Ár 1984, mikudagin 21. mars boðaði tingformaðurin frá einum fyrispurningi frá Óla Breckmann, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

Eru aðrar reglur galdandi fyri innlating av kommunalum roknskapum enn fyri innlating av roknskapum frá privatum virkjum og einstaklingum.

**Viðmerkingar:**
Herfyri feldi meiriluti í einum føroyskum býráði roknskapin hjá kommununi fyri seinasta fíggjarár. Sostatt er roknskapurin hvørki samtyktur og neyvan heldur innlatin til kommunalu yvirvøldina í landsstýrinum.

Fleiri ferðir er eisini komið fyri, at kommunur hava ikki latið roknskapin inn fyrrenn ár eftir fíggjarárslok.

Í øðrum førum hava roknskapir hjá kommunum ligið í landsstýrinum, tí myndugleikaranir hava ikki hildið teir kunna góðkennast.

Av tí at hin einstaki skattgjaldarin og vinnuligar fyritøkur við roknskapar- og skattskyldu verða revsað við bót fyri at lata roknskap inn ov seint, hevur tað almennan áhuga at vita, um kommunur og almennir stovnar hava linari treytir at ganga undir.

Flestu okkara hava ta fatan, at ølt skulu vera javnstillað undir lógini.

23. mars varð við 15-0 atkvøðum ikki samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður. Málið sostatt fallið.

F.L.j.nr. 806-5.

# 100-26. Fyrispurningur til løgmann. Viðvíkjandi arbeiðssteðginum á Telefonverki Føroya Løgtings.

Ár 1984, mikudagin 21. mars boðaði tingformaðurin frá einum fyrispurningi frá Asbjørn Joensen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

I. Vil løgmaður geva tinginum frágreiðing um, hvat veruliga er orsøkin til arbeiðstrætuna á telefonverkinum.

II. Er landsstýrið sinnað til, um neyðugt at gera politisk tiltøk fyri at forða fyri, at ein so lítil ósemja kann leggja samfelagið lamið, við teim fylgjum hetta førir við sær.

**Viðmerkingar:**
Seinastu vikurnar eru vit gjøgnum tíðarrit og útvarp vorðin kunnug við, at arbeiðssteðgur er á kaðaldeildini hjá Telefonverki Føroya Løgtings.

Hin vanligi brúkarin av telefonini hevur til nú neyvan varnast hendan arbeiðssteðg, helst orsakað av, at gott veðurlag og cydnan ikki hava volt stórvegis brek á kaðalneti.

Neyðugt verður tí hjá teimum, sum skipa fyri hesi arbeiðsósemju at taka stig til eina víðkan av arbeiðstrætuni til at umfata fleiri almennar stovnar.

Tíðindi siga frá, at ósemjan einans umfatar spurningin, um fólk, ið sett verða í starv, sjálv kunnu avgera, hvør felagsskapur skal verða umboð teirra í fakligum og fíggjarligum spurningum. Arbeiðsstøðgur fyrikemur tí heilt órímiligur, og vælgrundað er tí hugsanin um, at her liggur annað aftanfyri.

Hendan trætan gevur ikki grundarlag fyri, at alt samfelagið kann leggjast lamið. Hetta hevur ikki neyðugt einans fíggjarligar avleiðingar, men kann hetta av umstøðunum eisini føra við sær hendingar, ið kunnu fáa álvarsligar fylgjur.

Tað eigur í hesum sambandi at verða gjørt vart við, at hetta starv, sum talan er um alt seinasta ár hevur verið røkt av kaðalmeistaranum við telefonstøðina í Klaksvík, ið røkir norðoyggjarnar og part av Eysturoy.

Varð hendan loysnin møgulig seinasta ár, áttu møguleikar at verið fyri einum framhaldi av hesi skipan, til ein endalig avgerð varð funnin, í semju ella við rættaravgerð.

23. mars varð við 18-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

26. mars svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

1. Gongdin í málinum viðvíkjandi arbeiðssteðginum á Telefonverki Føroya Løgtings hevur verið hendan:

   *1.* Eftir at starvið á kaðaldeild Telefonverksins sum kaðalmeistari fyri øki I (Tórshavn), II (Norðurstreym), III (Vágoy) og IV (Sandoy) varð vorðið leyst á vári 1983, lýsti Telefonverkið eftir verkfrøðingi ella linjumeistara.

   Millum umsøkjararnar til starvið var ein byggifrøðingur og avgjørdi Telefonverkið, at hesin skuldi setast. Stovnurin søkti síðan um góðkenning landsstýrisins av setanartreytum hansara. Landsstýrið sendi málið til ummælis hjá Føroya Byggifrøðingafelag, sum gevur landsstýrinum ummæli tann 31. august 1983.

   *2.* Stutt eftir hetta ger Starvsmannafelagið landsstýrinum vart við, at nevndi byggifrøðingur skal røkja meistarastarv, sum er umfatað av starvsmannasáttmálanum. Aftaná at Telefonverkið hevði sett byggifrøðingin í starvið, ger landsstýrið úrskurð, sum gevur Starvsmannafelagnum viðhald í, at starvið er eitt vanligt

meistarastarv, sum lønast skal sambært 15. lønarflokki eftir starvsmannasáttmálanum, og varð avgjørt, at setti byggifrøðingurin skuldi fáa eina freist til 1. mars 1984 at avgera, um hann vildi taka við lønini sambært 15. lønarflokki eftir starvsmannasáttmálanum ella fara úr starvinum.

*3.* Tann 15. februar 1984 vendir stjórin fyri Telefonverkinum sær til landsstýrið við umsókn um góðkenning av, at nýtt byggifrøðingastarv verður normerað á kaðaldeildini.

Aftaná samráðingar millum stovnin og landsstýrið avger landsstýrið at góðkenna, at nýtt byggifrøðingastarv verður normerað á kaðaldeildini. Boðað verður tann 29. februar 1984 álitisfólki kaðaldeildarinnar frá hesi broyting á kaðaldeildini, og fær áður nevndi byggifrøðingur sama dag boð um, at hann er settur í nýggja byggifrøðingastarvið við gildi frá 1. mars 1984.

Hetta starv er eftir áskoðan landsstýrisins umfatað av galdandi sáttmála við Føroya Byggifrøðingafelag. Eisini var avgjørt, at leysa meistarastarvið skal lýsast leyst at søkja.

*4.* Síðan gevur Starvsmannafelagið limum felagsins á kaðaldeildini boð um at niðurleggja arbeiði frá 1. mars 1984 kl. 8.00, og fær landsstýrið boð um hetta sama dag saman við pástandi um, at landsstýrið hevur brotið galdandi sáttmála. Landsstýrið svarar felagnum aftur dagin eftir við frágreiðing um málið og fær landsstýrið nýtt skriv frá felagnum sama dag, har felagið ákærir landsstýrið fyri sáttmálabrot við at ganga uttanum sáttmálan. Samstundis setir felagið ávís krøv móti landsstýrinum.

Við skrivi frá 7. mars 1984 afturvísir landsstýrið ákæruni um sáttmálabrot og krevur spurningin viðgjørdan í gerðarrætti. Samstundis verður mint á, at arbeiðssteðgurin er brot á galdandi sáttmála, og verður skoytt uppí, at landsstýrið skilar sær rætt til at venda aftur til spurningin um endurgjald.

Við skrivi frá 8. mars 1984 avvísir felagið kravi landsstýrisins um gerðarrætt.

Arbeiðssteðgurin verður nú víðkaður at umfata limir Starvsmannafelagsins á Telefonverkinum uttan »neyðtænastuna«.

Tann 9. mars 1984 var fundur ámillum partarnar, og endurtók felagið, at kravið um gerðarrætt verður avvíst. Eisini varð boðað frá, at felagið fer ikki at stevna landsstýrinum fyri rættin fyri sáttmálabrot. Hetta seinna varð endurtikið av formanni felagsins tann 11. mars 1984. Fundur ímillum partarnar tann 20. mars 1984 gav heldur einki úrslit.

5. Landstýrið og Telefonverk Føroya Løgtings eru av teirri áskoðan, at stovnurin aftaná góðkenning landsstýrisins hevur heimild at normera og seta nýtt starv sum áður tilskilað, í hesum føri sambært byggifrøðingasáttmálanum.

6. Semja er gjørd millum landstýrið og Starvsmannafelagið tann 22. mars 1984. Eftir hesi semju verður kaðaldeildin skipað soleiðis sum góðkent av landsstýrinum tann 29. februar 1984, t.v.s. við 4 meistarum og einum byggifrøðingi undir leiðslu av deildarleiðaranum. Felagið hevur fingið váttan um, at setti byggifrøðingur ikki skal gera kaðalmeistaraarbeiði.

II. Landsstýrið arbeiðir við at gera uppskot til lóg um arbeiðsrætt við tí fyri eyga, at arbeiðsrætturin skal hava heimild til at døma í ósemjum millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum, herundir at áleggja sekt fyri brot á lønaravtalur v.m.

F.L.,j.nr. 1900-10-42.

# 100-27. Fyrispurningur til Annfinn Kallsberg, landsstýrismann, viðvíkjandi sølu av lastbilunum hjá Strandferðsluni.

Ár 1984, mikudagin 21. mars boðaði tingformaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Ova Mikkelsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

1. Er tað endaliga avgjørt, at teir reyðu lastbilarnir hjá Strandferðsluni skulu latast yvir á privatar hendur?
   Um so er, hvussu skal hetta gerast?
   Og nær verður hetta gjørt?

2. Sum er , eru hesir lastbilar jú alm: .ı ogn. Kann so ein tilvildarligur landsstýrismaður uttan víðari avhenda almenna ogn til privatar?
   Er nøkur heimild til at gera hetta?
   Um so er, hvør er hon?

3. Hví skulu hesir almennu lastbilar nú gerast privat ogn?
   Og hvør er orsøkin til, at tað privata skal reka teir?

**Viðmerkingar.**

Nú hava lastbilarnir hjá Strandferðsluni koyrt í fleiri ár og flutt frakt til smábygdir og hava vørurnar verið koyrdar til hurðina, eins og henda almenna service hevur verið sera væl røkt til frama fyri smábygdirnar. Hví skal hetta nú latast privatum at røkja? Og hvussu við teimum monnum, sum hava starvast við hesum øll hesi ár? Verða teir uppsagdir nú ella nær? Reint menniskjaliga hava hesi fólk krav uppá at fáa greið boð um teirra komandi lagnu, og tí loyvi eg mær

at seta hesar spurningar til landsstýrismannin Anfinn Kallsberg, sum hevur hetta mál um hendi.

26. mars varð við 28-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

7. mai svaraði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Ove Mikkelsen hevur sett mær spurningar viðvíkjandi sølu av lastbilum hjá Strandferðsluni.

Til hesar er at svara:

1. Landsstýrið hevur samtykt at privatisera lastbilakoyringina hjá Strandferðsluni. Hetta skal gerast á tann hátt, at bilførararnir skulu sjálvir eiga og reka hesar bilar, meðan frankering og avgreiðslur hjá strandferðsluni skulu halda áfram á sama hátt sum nú. Hetta verður gjørt so skjótt sum fyrireikingarnar eru loknar. Málið er til viðgerðar í samferðslunevndini í løtuni.

2. Tað er rætt at hesir lastbilar eru almenn ogn. eg meti at ein sokallaður *tilvildarligur* landsstýrismaður ikki bert hevur loyvi, men skyldu at fremja eina landsstýrisviðtøku, tá hann a*av tilvild* hevur málsøki. Í dag verða bilar seldir av strandferðslunni uttan nakað loyvi, so eg dugi ikki at síggja at ein landsstýrisviðtøka er heimildarloysi. Vit fara tó at leggja málið fyri fíggjarnevndina til góðkenningar.

3. Til tann 3 spurningin er at siga, at tað almenna hevur sett á stovn busskoyring í Streymoy—Eysturoy—Sandoy og nú eisini í Suðuroy, og er henda skipan uppbygd soleiðis, at privatir, sum hava koyrt á hesum rutum, nú koma at koyra eina almenna fastlagda rutu, meðan bilførarin framvegis eigur og rekur bussin fyri eitt ávíst gjald, baserað uppá sáttmála millum Føroya Landsstýri og hvønn einstakan arbeiðstakara.

   Ætlanin er at brúka júst somu skipan til lastbilakoyringina, tí mett verður at hettar kemur at gera hesa koyring ódýrari, enn hon er í dag.

# 100-28. Fyrispurningur til Paula Ellefsen, løgmann, viðvíkjandi loyniligari lurtitænastu.

Ár 1984, fríggjadagin 23. mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Jóannesi Dalsgaard, løgtingsmanni:

**Fyrispurningur**

Hvørji stig ætlar landsstýrið at taka í samband við, at nú er vorðið avdúkað, at

1) Føroyar í stríð við fortreytirnar fyri innliman Danmarkar í Nato í 1949 hýsir loyniligari lurtistøð,

2) at henda lurtistøð hvørki er undir donskum myndugleika ella Natomyndugleika, men beinleiðis er ogn hjá og verður rikin av amerikansku loftverjuni?

**Viðmerkingar:**

Sum kunnugt hevur pressan borið tey tíðindi, at onnur støðin á Sornfelli rekur eitt virksemi, sum á ongan hátt kann sameinast við ta uttanveltaðu støðu, sum Føroyar hava sambært gjørdar løgtingssamtyktir.

Aftrat hesum kemur, at henda eina støð er ogn hjá amerikansku loftverjuni og verður rikin av loyniligu amerikansku fregnartænastuni NSA og alt bendir á, at støðin hevur til endamáls at flyta upplýsingar, sum eru innsavnaðir á ólógligan hátt kring um í Vesteuropu.

Henda støð er hvørki undir NATO-myndugleika ella undir nøkrum donskum myndugleika og er sostatt klárt í stríð við danskan verjupolitikk.

Støðin verður fyri NSA rikin av fyritøkuni ITT, ið er illa kend fyri virkið at undirmáa demokratiini í fleiri londum, nakað, sum eigur at verða øllum tingmonnum atkunnugt.

Tað má tí vera av almennum áhuga at fáa at vita, hvørji stig landsstýrið ætlar at taka, til tess at sleppa okkum av við henda ódámliga gest, og verður hesin fyrispurningur tí settur løgmanni.

23. mars varð við 21-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

11. aprfl 1984 svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis

**Svar**

Jóannes Dalsgaard, løgtingsmaður, hevur sett mær hesar tveir spurningar:

Hvørji stig ætlar landsstýrið at taka í samband við, at nú er vorðið avdúkað, at

1) Føroyar í stríð við fortreytirnar fyri innliman Danmarkar í Nato í 1949 hýsir loyniligari lurtistøð,
2) at henda loyniliga lurtistøð hvørki er undir donskum myndugleika ella Nato-myndugleika, men beinleiðis er ogn hjá og verður rikin av amerikansku loftverjuni?

*Viðvíkjandi spurningi 1 og 2:* Hóast landsstýrinum kunnugt einki nýtt er »vorðið avdúkað« í hesum máli, hevur landsstýrið sett sær fyri at gera ávísar kanningar.

Um nakað kemur fram, sum undanfarin landsstýri verða mett ikki at hava havt kunnleika um, so verða neyðug stig tikin.

Fyrr enn nevndu kanningar eru loknar, ber ikki til at svara spurninginum.

# 100-29. Fyrispurningur til Tórbjørn Poulsen, landsstýrismann, viðvíkjandi landsstýrisins viðgerð av kommunalum roknskapum.

Ár 1984, friggjadagin 23. mars boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Óla Breckmann, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

Hvat ger landsstýrið við kommunur, sum ikki lata roknskap inn til tíðina.

Verða einstaklingar og virki viðfarin øðrvísi, tá tey forsøma at lata roknskap inn til tíðina, enn kommunur verða viðgjørdar, tá tær ikki røkja sínar roknskaparligu skyldur mótvegis landsmyndugleikunum.

**Viðmerkingar**

Herfyri feldi meiriluti í cinum føroyskum býráði roknskapin hjá kommununi fyri seinasta fíggjarár. Sostatt er roknskapurin hvørki samtyktur og neyvan heldur innlatin til kommunala eftirlitið í landsstýrinum.

Fleiri ferð er eisini komið fyri, at kommunur hava ikki latið roknskap inn fyrrenn fleiri ár eftir fíggjarárslok.

Í øðrum førum ' iva roknskapir hjá kommunum ligið í landsstýrinum, tí myndugleikarnir hava ikki hildið, teir kundu verða góðkendir

Av tí at einstaki skattgjaldarin og vinnuligar fyritøkur við roknskapar- og skattskyldu verða revsað við bót og mett í skatti fyri at lata roknskap inn ov seint, hevur tað almennan áhuga at vita, um kommunur og almennir stovnar hava linari treytir at ganga undir.

Flestu okkara hava ta fatan, at øll skulu vera javnstillað undir lógini.

26. mars varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

6. apríl 1984 svaraði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Reglurnar fyri innlating av kommunalum roknaskapum eru at finna í kommunulógini, løgtingslóg nr. 45 frá 29. juni 1972.

Roknskapurin skal vera landsstýrinum í hendi í seinasta lagi 1. december í tí ári, fíggjarárið endar.

Hevur kommuna gjørt brot á galdandi lóg, eitt nú sloppið sær undan at gera skyldur sínar, kann landsstýrið um neyðugt áleggja teimum einstøku bygda(r)ráðslimunum tvingsilsbøtur ella við rættarmáli gera persónliga ábyrgd galdandi í móti teimum einstøku bygda(r)ráðslimunum.

Í so máta eru somu reglur galdandi fyri kommunalan roknskap, sum fyri roknskap hjá privatum virkjum og einstaklingum, at menn kunnu verða revsaðir við bót, um roknskapurin er latin ov seint inn.

Tað hevur vist seg trupult at fáa teir kommunalu roknskapirnar inn rættstundis. Av teimum 50 kommununum resta alsamt tær 20 at senda roknskapin inn fyri roknskaparárið 1982/83. Av hesum 20 eru fleiri kortini til viðgerðar hjá grannskoðara.

Hóast roknskapirnir mangan eru komnir seint inn, hevur, síðani kommunulógin kom í gildi í 1972, enn einki kommunustýri verið revsað við bót. Tó hevur landsstýrið sett onnur tiltøk í verk mótvegis kommunum, sum ikki rættstundis hava latið inn roknskap, t.d. hevur landsstýrið í fleiri førum sýtt fyri at viðgera umsóknir frá kommunum um m.a. loyvi til lántøku. Í einstøkum føri hevur landsstýrið eisini afturhildið inngoldna kommunuskattin hjá kommununi, sum ikki hevði roknskaparviðurskiftini á lagi. Soleiðis hevur tað higartil altíð eydnast at fáa roknskapirnar inn um ikki fyrr so seinni.

# 100-30. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann. Viðvíkjandi útbyggingarætlanini fyri Klaksvíkar sjúkrahús.

Ár 1984, fríggjadagin 23. mars boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Vilhelm Johannesen, løgtingsmanni, viðvíkjandi útbyggingarætlanini fyri Klaksvíkar sjúkrahús.

**Fyrispurningur**

1. Hava samráðingar verið millum heimastýrið og ríkisstýrið um 2. og 3. byggistig í útbyggingarætlanini fyri Klaksvíkar sjúkrahús?

2. Um svarið uppá fyrra spurningin er játtandi, hvussu langt eru so hesar samráðingar komnar — eru tær loknar ella nær kunnu vit vænta, at eitt úrslit fyriliggur?

3. Um svarið uppá fyrsta spurningin ikki er játtandi, vil tað so siga at útbyggingin av Klaksvíkar sjúkrahúsi verður steðgað nú 1. byggistig er liðugt?

**Viðmerkingar:**

Í 1980 vóru tvinni samráðingarumfør millum heimastýrið og ríkisstýrið um útbyggingarætlanina fyri Klaksvíkar sjúkrahús. Hesir fundir vóru í Keypmannahavn ávikavist 18. januar og 4. juni. Úrslitið av

hesum samráðinguin var at fíggjarnevndin hjá fólkatinginum í august sama ár játtaði ríkiskassans part av 1. byggistigi.

Arbeiðið við at gera fyrsta partin av 1. byggistigi fór í gongd longu á heysti 1980. Tá var farið undir útgrevstur, planering, kloakkering og at gera fundament. Meðan hetta arbeiði varð gjørt varð detailprojektið og útboðstilfarið gjørt endaliga liðugt, soleiðis at tað veruliga byggiarbeiði kundi fara í gongd móti sumri 1981. Byggiarbeiði varð mett at taka trý ár.

Ætlanin var, at meðan arbeiðið við 1. byggistigi fór fram, skuldu samráðingar verða millum heimastýrið og ríkisstýrið um 2. og 3. byggistig, soleiðis at eitt úrslit kundi fyriliggja áðrenn arbeiðið við 1. byggistiði var liðugt, og at arbeiði við 2. og 3. byggistigi harvið kundi gerast sum eitt framhald av 1. byggistigi. Arbeiðið við 1. byggistigi er nú liðugt og hesin parturin av sjúkrahúsinum, sum m.a. umfatar Ellis- og røktarheim, verður tikin í nýtslu um einar tvær vikur.

Í útvarpinum hava vit hoyrt, at landsstýrið hevur samtykt at játta landskassans part av 2. byggistigi, og at málið síðan er sent ríkisstýrinum. Hesi tíðindi siga kortini onki um, at nøkur semja er gjørd millum heimastýrið og ríkisstýrið framman undan, og tí hevur tað áhuga at vita, um nakrar samráðingar hava verið millum heimastýrið og ríkisstýrið hesi trý árini arbeitt hevur verið við 1. byggistigi.

Hava slíkar samráðingar verið við positivum úrslitið, er tað at spurningurin um peningajáttan til 2. byggistig nú er sendur ríkisstýrinum, bert ein formalitetur. Hava hesar samráðingar ikki verið, gevur landsstýrisins samtykt onga veruliga ábending um, nær farið kann verða undir 2. og 3. byggistig ella um tað í heila tikið verður farið undir hesi byggistig.

26. mars varð við 28-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

30. mars 1984 varð við tingsins loyvi fyrispurningurin svaraður av Páll Vang, landsstýrismanni, soleiðis:

**Svar**

*1, 2 og 3:* Byggistig 2 fevnir um eina umbygging av Klaksvíkar Sjúkrahúsi, meðan 3. byggistig er ein nýmótansgerð av verandi bygningum.

Viðv. 2. byggistigi er at siga, at í løtuni meta danir seg ikki hava møguleika at fíggja sín part.

Landsstýrisins metan er eisini, at tað er skeivt at taka endaliga støðu til hetta byggistig, fyrr enn álitið frá 6 mann tingnevndini viðv. útbyggjan av sjúkrahúsverkinum fyriliggur.

Tí eru sjúkrahússtýrið, ráðleggingarnevndin og landsstýrið samd um at halda áfram við 3. byggistigi, meðan bíðað verður við støðutakan til 2. byggistig. Landsstýrið hevur samtykt at fara undir 3. byggistig, sum mett fer at liggja um einar 10. mill. kr.

Fyribilssamráðingar hava verið við Ríkisumboðið og verða endaligar samráðingar við innanríkisráðharran 27. apríl.

# 100-31. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann, viðvíkjandi flogvølli í Eysturoy.

Ár 1984, fríggjadagin 23. mars boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Jógvan I. Olsen, løgtingsmanni, viðvíkjandi flogvølli á Skorðhædd í Eysturoy.

**Fyrispurningur**

Hvat hevur landsstýrið gjørt við at kanna møguleikarnar fyri at fara undir bygging av flogvølli á Skorhædd í Eysturoy, staðið, sum í síni tíð varð hildið at vera best hóskandi fyri tíðarhóskandi floghavn.

**Viðmerkingar:**
Flogvallaspurningurin í Føroyum er ein ilskunnarsøga, orsakað av at lokal áhugamal hava forðað fyri eini skilagóðari loysn á hesum spurningi, tað sæst alt meira klárt, at vaksandi tørvur er fyri at fáa eina floghavn við nóg longum og krossgangandi flogbreytum.

Herfyri hoyrdist, at Fiskasølan ætlaði at fara undir at flyta fiskavørur loftvegis il Amerika, men orsakað av ov vánaligum flogvølli lat hetta seg ikki gera, vit hoyra at norðmenn flyta stórar nøgdir av fiskavørum loftvegis, t.d. verður aldur laksur, ið fer til amerikanska marknaðin, fluttur á henda hátt.

Vit hava stórar vónir um, at fiskaaling verður ein týðandi táttur í okkara framleiðslu, men um vit skulu kunna kappast við aðrar á heimsmarknaðinum, við leskiligum, sprelfeskum, dýrum fiskavørum, so má flutningurin verða loftvegis. Mistakið, ið varð gjørt viðvíkjandi flogvallaspurninginum, kann bert rættast við at byggja eina nýggja floghavn, har umstøðurnar eru til tess.

Seinastu tingsetu samtykti løgtingið at biðja landsstýrið um at kanna møguleikarnar fyri at fara undir bygging av flogvølli á Skorhædd í Eysturoy og at leggja úrslitið fyri løgtingið.

Nú fer henda tingseta at halla, men enn er einki úrslit lagt fyri tingið, tí loyvi eg mær at spyrja háttvirda landsstýrismann Páll Vang, sum umsitur hetta málsøkið, frammanfyri nevnda spurning.

26. mars varð við 28-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

4. mai svaraði Páll Vang, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis

**Svar**

Viðvíkjandi bygging av møguliga nýggjum flogvølli var Skorhædd í Eysturoy nevnd sum egnað øki.

Men nevnt var eisini økið sunnan fyri Søltuvík á Sandoynni og økið inn av Glyvursnesi á Streymoynni sum hóskandi til floghavnir.

Hvørt av hesum trimum plássum hava sínar fyrimunir, og hvar vøllurin, um hann kemur — verður bygdur, avhongur av, hvørjar fyrimunir, menn tit ta tíð halda telja mest.

Landsmyndugleikarnir hava í felag og semju bygt út vøllin í Vágum síðan miðjuna av sjeytiárunum — og gera tað framvegis.

# 100-32. Fyrispurningur til løgmans viðvíkjandi minstuløn og øðrum stuðuli til fiskivinnuna.

Ár 1984, fríggjadagin 23. mars boðaði formaðurin frá einum fyrispurningi frá Atla Dam, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

**Fyrispurningur**

1. Vil løgmaður gera so væl at greiða frá, hvørjar ítøkiligar broytingar til galdandi lóggávu um ráfiskagrunn, minstulønar- og aðrar stuðulsskipanir, hann ikki hevur fingið samtyktar í samgonguni.
2. Vil løgmaður gera so væl at greiða nærri frá ætlanum sínum um eina effektivari stuðulsskipan, sum ikki hevur slíkar óhepnar avleiðingar sum galdandi skipan.

**Viðmerkingar:**

Undir sending herfyri í Útvarpi Føroya nevnd: »Búskaparfrágreiðingin, sum hvarv« segði løgmaður, at hann hevði arvað eitt system frá undanfarnu samgongu, og hann hevði ikki verið maður fyri at broyta tað, tí ein av flokkunum, sum sat í undanfarnu samgongu, eisini sat í hesi.

Løgmaður gav »Ráðgevandi Nevndini« rætt, tá hon sigur, at stuðulin til fiskivinnuna verður givin »upp á forkertan máta«, men hann sigur samstundis, at hann hevur ikki fingið tað ígjøgnum í samgonguni at gera broytingar.

Tá løgmaður ikki hevur fingið broytingar ígjøgnum, má hetta merkja, at hann hevur havt ítøkilig uppskot um broytingar.

Tá nú semja er um, at stuðulsskipanin hevur óhepnar avleiðingar, er tað av stórum týdningi, at øll hugskot til batar koma fram í kjak-

inum, um hvussu vit greiða ta byrðu, stuðulsskipanin upp á longri sikt kann gerast.

Tað er tí rímiligt og av stórum áhuga, at løgmaður sleppur at leggja tey hugskot fram í ljósið, sum samgongupartnarnarnir hava forða honum at fáa framt.

26. mars varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

11. apríl svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Atli P. Dam hevur sett mær tveir spurningar.

*Spurningur 1:* »Vil løgmaður gera so væl at greiða frá, hvørjar ítøkiligar broytingar til galdandi lóggávu um ráfiskagrunn, minstulønar- og aðrar stuðulsskipanir, hann ikki hevur fingið samtyktar í samgonguni«. Hesin spurningur er í sjálvum sær sera áhugaverdur. Ein fyrrverandi løgmaður, nú andstøðulciðari, setur fram spurning á Føroya Løgtingi um internar samráðingar, sum farnar eru fram innan samgonguna.

Í fyrsta lagi kundi ein skúgva spurningin til viks sum barnsligan, og sum eina roynd at krógva út yvir tørvandi andstøðupolitikk.

Hin vegin er ein noyddur at viðganga, at andstøða, eins og almenningurin annars, í alt ov stóran mun hevur sæð almenna umrøðu um tær samráðingar, sum hava verið innan samgonguna.

Tað sum fram er farið á afturlatnum samgongufundi, tað sum sagt er, bæði á samgongufundum og landsstýrisfundum, hevur alt ov ofta staðið at lisið í ávísum blað stutt aftaná — og tað sum er enn verri — oftast skeivt frásagt.

Tann ósketni áskoðarin ella áhoyrarin kann hava fingið ta fatan, at talan er um eitt samgongufyribrigdi. Men her fer hann skeivur. Talan er stórt sæð bert um umboðini fyri tann eina samgonguflokkin. Umboðini fyri sambandsflokkin, bæði á løgtingi og í landsstýri, hava sjálvsagt ikki broytt áskoðan á hvussu samgongusamarbeiði eigur at fremjast.

Út frá hesum verður ikki gingið ynskinum hjá Atla P. Dam á møti um eina frágreiðing um internar samráðingar í verandi samgongu.

*Spurningur 2:* »Vil løgmaður gera so væl at greiða nærri frá ætlanum sínum um eina effektivari stuðulskipan, sum ikki hevur slíkar óhepnar avleiðingar sum galdandi skipan«.

Hesin seinni spurningurin er eisini sera áhugaverdur.

Tá verandi stuðulsskipan varð samtykt, var Atli P. Dam løgmaður og samgonguleiðari. Sum formaður fyri tá størsta andstøðuflokkin á løgtingi, ávaraði eg, saman við mínum partamonnum, ímóti hesi skipan.

Í dag eru vit báðir eftir øllum at døma samdir um, at stuðulsskipanin hevur óhepnar avleiðingar.

Í viðmerkingum sínum skrivar Atli P. Dam m.a.: »Tá nú semja er um, at stuðulsskipanin hevur óhepnar avleiðingar . . . . . «.

Høvuðsorsøkin til tær óhepnu avleiðingarnar av verandi skipan er, at táverandi politiska leiðslan legði ábyrgdina frá sær út til nøkur umboð, fyrst og fremst vald av vinnuni.

Ávísar broytingar eru gjørdar av verandi samgongu tann vegin, at landsstýrið nú fær betri tamarhald á spurninginum. Deils hevur tað almenna fleiri nevndarlimir í Ráfiskagrunninum, og deils er upphæddin til Ráfiskagrunnin minkað í mun til samlaðu stuðulsupphæddina til fiskivinnuna.

Stuðulslóggávan fyri komandi ár fer eisini at geva eitt meira rímuligt afturgjald til fiskivinnuna enn undanfarin ár.

Hin vegin er ein noyddur at ásanna, at tann endurskoðanin av stuðningsskipanini til fiskivinnuna og av lógini um ráfiskagrunnin, sum semja var um í almannakunngjørda samgonguskjalinum, ikki er framd og neyvan verður framd í hesum valskeiðnum.

# 100-33. Fyrispurningur til løgmans, um skilabøtur og kreppulóggávu.

Ár 1984, fríggjadagin 23. mars boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Atla P. Dam, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

Løgmaður boðaði í nov./dec. 1981 frá, at kreppulánsskipanin, sum hevði virkað í nøkur ár, fór at verða avloyst av onkrari skilabótaskipan, sum hann tá arbeiddi við, og sum var so háttað, at hon nærum var ein »Columbusloysn« sammett við aðrar skipanir.

Nær verður uppskot um slíka skipan lagt fram?

**Viðmerkingar:**

Seint á ári 1981 legði landsstýrið fram uppskot um kreppulánsheimild, sum skuldi standa við í december mánaði 1981.

Nýggj heimild fyri januar 1982 og ein triðja fyri februar/mars 1982 varð eisini fingin til vega.

Javnaðarflokkurin hevði tá uppskot um skilabótalán til fiskivinnuna — ein saneringsætlan viðvíkjandi fiskivinnuni — og fekk hetta uppskot góða undirtøku frá flestum tingmonnum.

Hesir mettu, at onkur skipan átøk uppskoti Javnaðarfloksins átti at verða samtykt í staðin fyri vanligu kreppulánsloysnina.

Løgmanni hóvaði tó ikki uppskotið, og kveistraði hann tað — helst við § 13 í hondini — til viks, og segði seg arbeiða við eini skipan, sum var so góð, at hon — við egnu orðum løgmans — »simpelthen« var »Loysnin«.

»Loysnin« skuldi hvørja ferð koma um fáar dagar, ti skuldu kreppulánsheimildirnar vera strangliga tíðaravmarkaðar í ultrastutt skeið, sum hvørt vardi úr nøkrum døgum upp í 1 og 2 mánaðir.

Nú eru ár liðin, og landsstýrið hevur trúliga framlagt nýggjar kreppulógir og uppískoytiskreppulógir fleiri ferðir um árið, umframt serligar veðhaldslógir í ávísum førum, soleiðis at hendan skipan, sum fyri árum síðani byrjaði við einari og tveimum milliónum krónum árliga, nú er vaksin til 25 milliónir sum fyrsta »rata« í einum fíggjarári.

Væl vita vit, at løgmaður oftast hveppir seg við at taka avgerðir um loysnir, tí hann heldur, at flestu vandamál loysast av sær sjálvum, sleppa tey bert at liggja nóg leingi, men at hann ikki metir slíka loysn nýtiliga í hesum spurningi sæst, tá hann sigur, at hann er samdur við »Ráðgevandi nevnd forsætismálaráðsins« um skeivleikarnar í tí, sum teir nevna »húsagangsverjuna« í føroyskum búskapi. Tó er hann aftur ov seinur á sjóvarfallinum, tí seinasti framløgudagur í hesi tingsetuni er í dag.

Men nú einki val varð útskrivað, tí fólkaflokkurin einaferð enn sýndi, at hann gongur frá givnum orðum, býðst helst løgmanni eitt stutt høvi á ólavsøku til at avdúka okkum »Loysnina«, og er hon so framúrskarandi, sum menn máttu meta í 1981, vildi verið spell, um hon ikki varð givin í arv teimum, sum skulu taka yvir eftir løgmanni.

Tað er tí forvitnisligt at frætta, um løgmaður vil lata tinginum, haðani nýggj samgonga verður skipað, »Loysnina« at umhugsa, arbeiði víðari við ella seta í gildi.

26. mars varð við 25-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

8. mai svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis

**Svar**

Sum kunnugt hevur landsstýrið biðið um eina nýggja heimild til veitan av kreppulánum upp á tilsamans 25 mió. kr. fyri fíggjarárið 1984/85.

Nevnast kann, at tørvurin eftir kreppulánum seinasta ár bert var upp á umleið helvtina av játtanini.

Roknast kann ikki við, at nakað nýtt uppskot verður lagt fram um kreppulóggávu í hesum valskeiðinum.

# 100-34. Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann. Viðvíkjandi handilsskúla á Kambsdali.

Ár 1984, fríggjadagin 23. mars bioðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Jørgen Thomsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

Nær verður farið undir at byggja nýggjan handilsskúla á Kambsdali?

**Viðmerkingar:**
Undir viðgerðini av tingmálinum um bygging av nýggjum handilsskúla við Marknagilsvegin í Tórshavn upplýsti landsstýrið, at so skjótt sum henda bygging varð liðug, skuldi arbeiðið byrja við at byggja nýggjan handilsskúla á Kambsdali í Eysturoy.

Hetta lyftið varð ein fortreytin fyri, at Føroya løgting samtykti at veita stuðul til handilsskúlabyggingina í Tórshavn og fyriliggur samtykt hesum viðvíkjandi.

Nú skjótt eitt árið er liðið síðan nýggi handilsskúlin í Havn varð tikin í brúk, og tað má tí hava stóran áhuga hjá ungdómi, hjá vinnulívi og samfelagnum sum heild at fáa at vita, nær byggingin á Kambsdali verður byrjað.

26. mars varð við 27-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

9. mai svaraði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis

**Svar**

Tá ið talan fyri nøkrum árum síðani var um at byggja handilsskúla í Havn, ynsktu føroysku myndugleikarnir, at ein skúli eisini var bygdur í Kambsdali.

Ríkismyndugleikarnir, sum vinnuskúlarnir hoyrdu undir, gingu við til hetta, treytað m.a. av, at projektið til handilsskúlan í Hanv varð minkað rættiliga munandi.

Núverandi landsstýri setti sær fyri sum eitt aðalmál í skúlapolitikkinum at virka fyri, at hond varð tikin um tað rættiliga forsømda vinnuskúlaøkið. Eitt umfatandi kanningar- og fyrireikingararbeiði er gjørt og er í ferð við at vera gjørt. Arbeitt hevur verið lutvíst við innihaldinum av teimum ymisku vinnuútbúgvingunum og lutvíst við at fáa til vega hóskandi skúlabyggingar.

Við hesum seinna hevur gingið strævið at fingið okkara egnu at síggja týdningin í og at bøta um viðurskiftini eitt nú á Sjómannsskúlanum, á Studentaskúlanum í Hoydølum og ikki minst í Studentaskúlanum í Eysturoy.

Tað hevur eisini verið strævið og torvunnið at yvirbevísa ríkismyndugleikarnar um tað neyðuga í at útvega hóskandi høli til maskinskúlan, tekniska skúlan í Havn og í Klaksvík og handilsskúlan á Kambsdali.

Men nú er líkt til at gongd fer at koma á. Eg havi í gjár fingið at vita, at undirvísingarmálaráðið hevur sett av nakað av peningi í ár og komandi tvey árini til vinnuskúlabyggjarí í Føroyum, og at nærri samráðingar hesum viðvíkjandi skulu vera, tá ið undirvísingarmálaráðharrin í juni kemur til Føroya at vitja.

Nær ið farið verður undir at byggja Handilsskúla á Kambsdali, er ikki møguligt í løtuni at svara nágreiniliga upp á, men við tí prioritering, sum ein meiriluti í landsstýrinum gevur bygging av handilsskúla, studentaskúla og við teimum møguleikum hetta gevur fyri at fáa eina fiskivinnuútbúgving á høgum støði har á staðnum, so meti eg ikki, at dagurin hevði verið so fjarur, um ikki Sjálvstýrisflokkurin hevur gjørt tað dáragerð móti føroyskum ungdómi at seta veto fyri at leggja málið um bygging av studentaskúla á Kambsdali fyri tingið.

# 100-35. Fyrispurningur til Anfinn Kallsberg, landsstýrismann.

Ár 1984, mánadagin 26. mars boðaði tingformaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Hilmar Bech, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

Ber ikki til at leggja ferðaætlanina hjá helikoptaranum Snípuni soleiðis, at hann eisini kann røkja flúgving upp á Suðuroy?

**Viðmerkingar:**
Nú helikoptarin Snípan er farin í regluliga flúgving kring oyggjarnar, er ferðaætlanin løgd soleiðis, at hann ikki hevur samband til Suðuroyar.

Ferðasambandið sjóvegis úr og til Suðuroynna til og um Havnina er skipað soleiðis, at fólk í Suðuroy mugu í flestu førum heimanífrá tíðliga á morgni og kunnu ikki vera aftur við hús fyrr enn seint á kvøldið, alt eftir hvar tey búgva í oynni, og um fólk eitt nú úr Havn skulu til Suðuroyar í ørindum, so sleppa tey í flestu førum bert suður um kvøldið og sleppa tí ikki norður aftur fyrrenn annan dagin eftir.

Tað hevði tí verið ein fyrimunur, um Suðuroyggin eisini varð tikin við inn í ferðaætlanina hjá helikoptaranum, fyri á tann hátt at bøta um ferðingarviðurskiftini frá og til Suðuroyar og at Suðuroyggin harvið fekk gagn av hesum nýggja flutningshátti aftrat teimum ferðingarmøguleikum, sum eru sjóvegis, tað veri seg við ferðafólki, posti o.ø.

26. mars varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

11. apríl svaraði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Tað ber til at leggja ferðaætlanina hjá tyrluni »Snípuni« solciðis, at eisini verður flogið til Suðuroynna. Hetta verður eisini gjørt nú sambært ferðaætlanina.

Tað eru tó rættiliga avmarkaðir møgulcikar fyri at røkja flúgving uppá Suðuroynna í tann mun, Hilmar Bech kemur inn á í viðmerkingum til spurningin. »Snípan« skal her serliga røkja sambandið til Skúvoyar og Dímun og teirra tilknýti til Suðuroynna, Sandoynna og Tórshavn á hesi farleið.

Beinleiðis fúgving til Suðuroynna eftir einum mynstri, sum spurt verður um, kann bert verða gjørd, um peningaliga játtanin til tyrluflúgvingina verður munandi økt.

F.L.j.nr. 1820-17-7-9.

# RED: 10 X



Nasjonalbibliote


**Nasjonalbiblioteket**

National Library of Norway

Rana Division

N-8607 Mo i Rana

Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 1





RE





Nas


**N**

**N**

**Telephone: +47 7**

# LØGTINGS
# TIDINDI

# 1983

# Løgtingstíðindi

Løgtingstíðindi 1983
© Føroya Landsstýri
Lagt til rættis: Ester Bech
Prenting: P/f Colour Print
Hefting: Helgi Justinussen

# Løgtingstíðindi
# 1983

**Bind B**

Skjøl til løgtingstíðindi

Tórshavn 1991

**Løgtingstíðindi**

**Bind B**

## Yvirlit yvir skjølini


| Skjal | | Bls. |
|---|---|---|
| 1 | Landskassin. Rakstrarroknskapur 1983/84 og fíggjarstøða pr. 31. mars 1984 | 9 |
| 2 | Fylgiskjøl til løgmansrøðuna 1983 | 53 |
| 3 | Skjøl til løgtingsmál nr. 6: Løgtingslóg um ásetan av skatti til landskassan | 120 |
| 4 | Skjal til løgtingsmál nr. 19: Álit frá nevndini, sum landsstýrið hevur sett at kanna og gera uppskot til tubbakslóggávu | 132 |
| 5 A-F | Skjøl til løgtingsmál nr. 27: Veðhald fyri láni til Húsalánsgrunnin | 140 |
| 6 | Skjal til løgtingsmál nr. 32: Bann móti allari trolveiðu á 12 fjórðingum úr landi vestan fyri Suðuroynna | 152 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 7 A-C | Skjøl til løgtingsmál nr. 35: Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1984/85 | A | 154 |
| | | B | 193 |
| | | C | 681 |
| 8 | Skjal til løgtingsmál nr. 42: Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1984 | | 738 |
| 9 A-B | Skjøl til løgtingsmál nr. 43: Skipan millum Føroyar og EEC um sínámillum fiskirættindi í 1984 | | 741 |
| 10 | Skjal til løgtingsmál nr. 47: Biograflóg og filmseftirlitslóg | | 752 |
| 11 | Skjal til løgtingsmál nr. 59: Uppskot til matvørulóg | | 760 |
| 12 | Skjal til løgtingsmál nr. 80: Sínámillum fiskirættindi Føroyar-Ísland | | 805 |
| 13 | Skjal til løgtingsmál nr. 89: Løgtingslóg um vernd av dýrum | | 810 |
| 14 A-B | Skjøl til løgtingsmál nr. 128: Uppskot til løgtingslóg um stuðul til musikkskúlar | | 843 |
| 15 | Skjal til løgtingsmál nr. 131: Løgtingslóg um veðhald fyri láni til Nordafar A/S | | 869 |
| 16 | Skjal til løgtingsmál nr. 145: Navnalóggávan | | 874 |
| 17 A-B | Skjal til løgtingsmál nr. 100-2: Fyrispurningur til løgmans | | 877 |

SKJAL 1

# LANDSKASSIN

## Rakstrarroknskapur 1983-84

og

## fíggjarstøða pr. 31. mars 1984

Løgtingstíðindi 1983 B 2

# Viðmerkingar til landskassaroknskapin 1983/84

Fylgjandi **ognir,** sum eru ífiggjaðar yvir § 13: Nýggir vegir, brýr, breiðkan av brúm og umsiting av vegum, eru ikki upptiknar í landskassans rokunskapi:

| **Skerv- og asfaltverk** | Byggi-kostnaður | Niðurskrivað til pr.31.84 |
|---|---|---|
| Skervverk í Porkeri | 3.867.910,00 | 2.140.071,00 |
| Skervverk á Sandi | 1.206.399,00 | 320.461,00 |
| Skervverk í Sandavági | 4.094.860,00 | 3.732.224,00 |
| Skervverk í Hundsarabotni | 15.727.768,00 | 6.590.879,00 |
| Skervverk á Lambareiði | 28.114.613,00 | 17.405.483,00 |
| Asfaltverk í Hundsarabotni | 5.770.628,00 | 2.823.283,00 |
| Asfaltverk á Lambareiði | 8.008.638,00 | 6.651.981,00 |
| Asfaltgoymsla í Hósvík | 7.849.604,00 | 3.600.279,00 |
| Asfaltverk í Porkeri | 562.552,00 | 562.552,00 |
| | 75.202.972,00 | 43.827.213,00 |

| **Smiðjur og goymsluhús** | Byggi-kostnaður | Niðurskrivað til pr.31.3.84 |
|---|---|---|
| Maskinstøðin í Kollafirði | 8.550.000,00 | 5.751.100,00 |
| Goymsluhús í Kollafirði | 2.000.000,00 | 1.714.800,00 |
| Smiðjan á Oyggjarvegnum | 50.000,00 | 5,00 |
| Smiðjan á Lambareiði | 220.000,00 | 116.500,00 |
| Smiðjan í Norðdepli | 80.000,00 | 23.500,00 |
| Smiðjan í Hvannasundi (nýggj) | 1.000.000,00 | 1.000.000,00 |
| Smiðjan á Sandi (gamla) | 50.000,00 | 24.800,00 |
| Smiðjan á Sandi (nýggja) | 1.200.000,00 | 1.200.000,00 |
| Smiðjan í Øravík (endurnýggjað) | 1.000.000,00 | 1.000.000,00 |
| Smiðjan í Kallsoynni | 100.000,00 | 67.700,00 |
| Smiðjan í Leirvík | 200.000,00 | 180.000,00 |
| Goymsluhús í Havnadali (nýtt) | 200.000,00 | 200.000,00 |
| Goymslu- og vaktarhús í sb. við kavagrevstri á Oyggjarvegnum | 250.000,00 | 250.000,00 |
| | 14.900.000,00 | 11.528.405,00 |

Fylgjandi **skuld** pr. 31. mars 1984 er ikki bókførd í landskassans rokunskapi:

| | |
|---|---|
| Keyp av maskinum upp á avgjald | 9.179.019,00 |
| Keyp av útgerð til skervverk | 2.562.522,00 |
| | 11.741.541,00 |

Omanlýri nevndu upphæddir eru samsvarandi uppgávum frá Landsverkfroðinginum.

Landskassans **uttanlandaskuld** tann 31. mars 1984 sær soleiðis út:

| | | Skuld 31.3.84 | Bókførd skuld | Skuld við kursi 31.3.84 |
|---|---|---|---|---|
| Exportfinans | Nkr. | 11.739.551,80 | 11.846.592,29 | 15.048.931,40 |
| Kreditbank, Luxembourg | Bfr. | 40.000.000,00 | 3.607.840,00 | 7.134.800,00 |
| Westdeutsche Landesbank | DM | 21.040.000,00 | 56.473.876,96 | 76.796.000,00 |
| Algemene Bank, Holland | Hfl. | 20.000.000,00 | 51.825.708,05 | 64.724.000,00 |
| N.V.Bank voor Nederland | Hfl. | 20.000.000,00 | 55.747.292,29 | 64.724.000,00 |
| Manufactor Hanover Ltd. | US-dollar | 9.500.000,00 | 69.170.009,25 | 93.772.600,00 |
| 3 lán agent Handelsbanken | US-dollar | 7.000.000,00 | 46.405.800,00 | 69.095.600,00 |
| 6 lán agent Privatbanken | US-dollar | 9.625.000,00 | 50.219.178,85 | 95.006.450,00 |
| Nordfinanz Bank, Zürich | Sfr. | 10.000.000,00 | 41.876.625,00 | 44.738.000,00 |
| Nordic Bank, London | Sfr. | 3.350.000,00 | 13.660.630,00 | 14.987.230,00 |
| | | | 400.833.552,69 | 546.027.611,40 |

Viðvíkjandi landskassans **veðhaldsskyldum** er at siga, at samlaða yvirlitið (fylgiskjal til landskassarokn skapin) veðhaldur landskassin 31.3.84 fyri 1.143.985.027 kr., og av hesum eru 154.189.772 kr. gjaldkomnar.
Tað er gjaldstovuni kunnugt, at roknskapurin viðvíkjandi landskassans veðhaldsskyldum ikki er eftirfarandi á ávísum økjum m.a. orsakað av tørvandi upplýsingum, ið ikki eru komnar gjaldstovuni í hendi.

**Eykafíggjarlógin** er vanliga prentað aftast í hesum roknskapi, men fyri 1983/1984 er ongin eykafíggjarlóg.

Undir landskassans bruttoinntøkum framgongur, at endurgjald ríkiskassans eru 292.721.975,25 kr., men her skal tilskilast, at 80.896.983,06 kr. ikki er við í nevndu upphædd. Hetta er ríkiskassans partur av rakstrinum av Landssjúkrahúsinum, sum hevur sjálvstøðugt on-line roknskaparhald við edv-systeminum hjá gjaldstovuni.

Hesin roknskapur er prentaður soleiðis:

400 eintøk av ársroknskapinum 1983/84
14 eintøk av kontolistum
14 eintøk av rakstrarstøðum, tó ikki § 13-1
14 eintøk av rakstrarstøðum § 13-1
14 eintøk av landskassans veðhaldsskyldum

# Rakstrarroknskapur landskassans fyri fíggjarárið 1983 84

(Samandráttur)

| | | Roknskapur | Fíggjarlóg |
|---|---|---|---|
| **Inntøkur:** | | | |
| (§ 1) | Skattir | 617.736.018,22 | 586.000.000,00 |
| (§ 2) | Toll- og framleiðslugjøld | 556.811.213,75 | 521.000.000,00 |
| (§ 3) | Onnur Gjøld | 1.345.616,85 | 960.000,00 |
| (§ 4) | Inntøkur av spæli | 1.000.717,89 | 650.000,00 |
| (§ 5) | Rentur og vinningsbýti v.m. | -:-29.927.721,85 | : 39.000.000,00 |
| (§ 6) | Landsstovnar (sjá rakstrarstað 100) | -:-53.608.096,83 | -:-73.043.000,00 |
| (§ 7) | Partur av avlopi danska tjóðarbankans | 41.746.081,34 | 5.000.000,00 |
| (§ 8) | Ymsar inntøkur | 892,09 | 5.000,00 |
| | | 1.135.104.721,46 | 1.001.572.000,00 |
| **Útreiðslur:** | | | |
| (§ 6) | Landsstovnar (sjá undir inntøkum) | | |
| (§ 10) | Løgtingið | 8.906.424,42 | 8.453.000,09 |
| (§ 11) | Landsumsitingin | 74.319.695,57 | 71.145.000,00 |
| (§ 12) | Heilsumál | 92.028.466,98 | 84.953.000,00 |
| (§ 13) | Samferðslumál, í grunnar | 110.800.000,00 | 110.800.000,00 |
| (§ 13) | Vegir, brýr v.m. | 60.481.488,59 | 60.500.000,00 |
| (§ 14) | Skúlamál | 96.469.849,79 | 95.990.000,00 |
| (§ 15) | Vísind, bókmentir og list | 37.683.542,96 | 37.636.000,00 |
| (§ 16) | Fiskivinna, sigling o.t. | 298.373.377,06 | 253.178.000,00 |
| (§ 17) | Landbúnaður og matrikulering | 28.654.019,65 | 28.314.000,00 |
| (§ 18) | Handil, iðnaður v.m. | 26.269.385,75 | 26.146.000,00 |
| (§ 19) | Almannamál | 187.737.493,35 | 190.980.000,00 |
| (§ 20) | Pensjónsútreiðslur | 3.654.392,54 | 3.465.000,00 |
| (§ 21) | Effektivar veðhaldsbindingar | 10.000.000,00 | 10.000.000,00 |
| (§ 22) | Aðrar og óvissar útreiðslur | 3.271.696,92 | 1.760.00. ,00 |
| (§ 23) | At leggja í ymsar grunnar v.m | : 25.414.934,69 | :-35.168.000,00 |
| (§ 24) | Avdráttir av lánum | 0 | 0 |
| (§ 25) | Avskrivingar | 60.723.182,67 | 52.257.000,00 |
| (§ 26) | Ymsar ognarútreiðslur | 91.590,14 | 150.000,00 |
| | Rakstraryvirskot 1983/84 | 61.055.049,76 | 1.013.000,00 |
| | | 1135.104.721,46 | 1.001.572.000,00 |

# Fíggjarstøða landskassans pr. 31. mars 1984

(Samandráttur)

| | | Aktiv | Passiv |
|---|---|---|---|
| (§ 30) | Kassa-, banka-, sparikassa og giro-peningur | 91.902.669,61 | |
| (§ 31) | Virðisbrøv | 14.529.051,00 | |
| (§ 32) | Útlán úr landskassanum | 141.754.042,33 | |
| (§ 33) | Inntøkueftirstøður | 431.498.375,52 | |
| (§ 34) | Aktiv hjá grunnum (innistandandi, útlán o.a.) | 470.281.217,61 | |
| (§ 35) | Aktiv hjá deponentum | 6.292.689,21 | |
| (§ 36) | Millumrokningar við kommunur | | 123.229.912,94 |
| (§ 36) | Millumrokningar við landsstovnar | | 9.012.491,21 |
| (§ 37) | Fastar ognir og anlegg | 26.289.297,78 | |
| (§ 38) | Skip | 89.884.502,06 | |
| (§ 39) | Millumrokning við nýtt fíggjarár | | 24.841.002,46 |
| (§ 40) | Millumrokning, skuld | | 31.146.994,25 |
| (§ 41) | Lán | | 635.049.006,00 |
| (§ 42) | Deposita | | 22.027.448,87 |
| (§ 44) | Grunnar | | 538.727.940,55 |
| (§ 45) | Íløgur fíggjað við lánum | 233.695.560,69 | |
| (§ 46) | Kapitalkonto | | 70.239.294,48 |
| (§ 50) | Refusiónsmillumrokningar | 11.969.826,78 | |
| (§ 51) | Vinnulánsgrunnur løgtingsins | | 1.821.335,29 |
| (§ 52) | Heilsufrøðilig starvsstova, 3 projektir | | 980.686,52 |
| (§ 61) | Skógfriðingarnevndin | 33.929,74 | |
| | Rakstraryvirskot | | 61.055.049,76 |
| | | 1.518.131.162,33 | 1.518.131.162,33 |

Viðvíkjandi ábyrgdum sjá undir fororðinum.

FØROYA GJALDSTOVA, tann 20. desember 1984

N. Rasmussen H. Mohr

# Rakstrarroknskapur landskassans fyri fíggjarárið 1983/84

Vísandi bruttoinntøkur (ríkiskassans endurgjøld við) og bruttoútreiðslur

(Kontobólkar)

| | | Inntøkur | Útreiðslur |
|---|---|---|---|
| Skattir | | 617.736.018,22 | |
| Toll- og framleiðslugjøld | | 556.811.213,75 | |
| Onnur gjøld | | 1.345.616,85 | |
| Inntøkur av spæli | | 1.000.717,89 | |
| Rentur og vinningsbýti o.a. | | | 29.927.721,85 |
| Partur av avlopi danska tjóðarbankans | | 41.746.081,34 | |
| Aðrar inntøkur | | 892,09 | |
| Endurgjøld: | | | |
| Ríkiskassin | 292.721.975,25 | | |
| Kommunur | 30.104.481,94 | | |
| Ymiskt | 1.788.258,57 | 324.614.715,76 | |
| Ymiskar inntøkur | | 57.227.763,31 | |
| Lønir og samsýningar | | | 283.581.579,22 |
| Ferðaútreiðslur | | | 8.886.238,70 |
| Útbúgving (skúlar o.a.) | | | 341.511,04 |
| Aðrar útreiðslur viðv. starvsfólki | | | 293.252,53 |
| Busrutuútreiðslur | | | 7.703.337,00 |
| Ekstern kommunikatión | | | 2.141.415,42 |
| Húsaútreiðslur | | | 14.193.422,99 |
| Entreprenørrakstur | | | 118.464.674,61 |
| Skrivstovuútreiðslur | | | 27.137.071,14 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | | | 138.736.838,56 |
| Andveikraforsorgin (100% ríkið) | | | 27.781.045,90 |
| Ulykkesforsikringsrådet o.a. (100% ríkið) | | | 433.154,69 |
| Landssjúkrahúsið | | | 61.766.358,07 |
| Heilsumál | | | 2.810.526,44 |
| Skúlamál | | | 13.650.337,00 |
| at flyta ... | | 1.600.483.019,21 | 737.848.485,16 |

| | Inntøkur | Útreiðslur |
|---|---|---|
| Flutt ... | 1.600.483.019,21 | 737.848.485,16 |
| Vísind, bókment og list ..... | | 9.356.000,00 |
| Fiskivinna og sigling ..... | | 281.196.111,79 |
| Landbúnaður og matrikulering ..... | | 21.968.168,92 |
| Handil, iðnaður o.a. ..... | | 24.402.048,15 |
| Almenn forsorg ..... | | 368.021.812,48 |
| Ymiskir studningar ..... | | 12.064.985,30 |
| Burturleggingar og avskrivingar ..... | | 45.308.247,98 |
| Samferðslumál ..... | | 39.262.109,67 |
| Rakstraryvirskot 1983/84..... | | 61.055.049,76 |
| | 1.600.483.019,21 | 1.600.483.019,21 |

# Specifikatión til 3000/6300 (§ 13)

| | | | |
|---|---|---|---|
| 3000 | Anlegg av vegum ..... | | 32.306.229,82 |
| 3100 | Kommunal arbeiði ..... | | ÷678.688,82 |
| 3200 | Tunnil, Húsar-Mikladal ..... | | 28.537.890,33 |
| 3300 | Ábøtur av vegum ..... | | 4.551.357,19 |
| 3400 | Viðlíkahald av vegum ..... | | 12.918.703,94 |
| 3500 | Vegarekkverk..... | | 906.941,82 |
| 3600 | Kavagrevstur ..... | | 3.672.662,31 |
| 3700 | Vegstudningur ..... | | 4.724.481,24 |
| 3800 | Ferjulegur, viðlikahald ..... | | 736.279,58 |
| 3900 | Asfaltering, gamlir vegir ..... | | 4.697.366,29 |
| 5600 | Mobil amboð — rakstur/keyp ..... | | 15.655.273,86 |
| 5700 | Smiðjur ..... | | 10.586.518,89 |
| 5800 | Skervverk ..... | | 11.566.338,69 |
| 5900 | Asfaltverk..... | | 11.427.699,78 |
| 6000 | Havnir | 63.812.173,87 | |
| 6100/6800 | Lendingar og bátahavnir | 23.725.494,62 | |
| | Mótrokningar | ÷87.537.668,49 | 0,00 |
| | | | 141.609.054,92 |

# Specifikatión

til rakstrarroknskapin fyri fíggjarárið 1983/84

## INNTØKUR

| | Roknskapur | Fíggjarlóg |
|---|---|---|
| **(§ 1) Skattir:** | | |
| 1108 Vanligur skattur | 579.526.110,00 | 550.000.000,00 |
| 1108 P/F-vinningsskattur 20% | 4.167.028,72 | |
| 1108 40%-skattur | 920.289,45 | |
| 1108 35%-eftirlønargjald | 208.409,76 | |
| 1507 Sjómansskattur | 9.809.853,00 | 12.500.000,00 |
| 1702 Rentuskattur | 10.288.957,34 | 10.000.000,00 |
| 1804 Vegskattur | 12.815.369,95 | 13.500.000,00 |
| | 617.736.018,22 | 586.000.000,00 |
| **(§ 2) Toll- og framleiðslugjøld:** | | |
| 2017 Tollgjøld | 541.336.579,21 | 507.000.000,00 |
| 2708 Framleiðslugjøld | 15.474.634,54 | 14.000.000,00 |
| | 556.811.213,75 | 521.000.000,00 |
| **(§ 3) Onnur gjøld:** | | |
| 3052 Spiritusskamtanarkort | 166.350,00 | 200.000,00 |
| 3102 Loyvisgjøld | 103.710,00 | 200.000,00 |
| 3204 Arvagjøld | 1.019.877,20 | 500.000,00 |
| 3256 Lestagjøld | 55.679,65 | 50.000,00 |
| 3501 Bøtur | 0 | 10.000,00 |
| | 1.345.616,85 | 960.000,00 |
| **(§ 4) Inntøkur av spæli:** | | |
| 4011 Happadrátturin | 546.850,95 | 450.000,00 |
| 4058 Burturlutingargjøld | 116.671,18 | 80.000,00 |
| 4096 V-4 | 337.195,76 | 120.000,00 |
| | 1.000.717,89 | 650.000,00 |

| | | Roknskapur | Fíggjarlóg |
|---|---|---|---|
| (§ 5) | **Rentur og vinningsbýti o.a.:** | | |
| 5105 | Sektarrentur av skatti og pantigjald ..... | 14.037.804,24 | |
| 5105 | Sektarrentur av motorgjaldi ..... | 112.056,22 | |
| 5105 | Renta banka- sparikassa- og giropeningi .. | 4.063.899,44 | |
| 5105 | Rentur av útláni o.a. ..... | 8.807.602,78 | |
| 5105 | Rentur av obligatiónum og partabrøvum.. | 28.314,82 | |
| 5105 | Rentur av tollkreditti ..... | 2.176.887,12 | |
| 5105 | Rentur viðv. iløgugrunninum ..... | 1.001.572,57 | |
| | | 30.228.137,19 | 30.000.000,00 |
| 5207 | Kursvinningur av uppt. lánum ..... | 2.643.087,12 | |
| 5207 | Rentuútreiðslur (upptikin lán o.a.) ..... | ÷62.798.946,16 | : 69.000.000,00 |
| | | ÷29.927.721,85 | ÷39.000.000,00 |
| (§ 6) | **Landsstovnar (rakstrarstøð 6014-6572):** | | |
| 6014 | Strandfaraskip Landsins ..... | ÷21.125.054,05 | : 31.465.000,00 |
| 6033-6099 | Bygdaleiðir..... | ÷ 5.290.278,14 | ÷ 4.700.000,00 |
| 6102 | Tjaldurs Apotekið ..... | 337.253,31 | 745.000 00 |
| 6204 | Telefonverk Føroya Løgtings ..... | : 31.084.136,68 | ÷31.600.000,00 |
| 6306 | Útvarp Føroya ..... | ÷ 2.841.278,46 | ÷ 3.727.000,00 |
| 6358 | Postverk Føroya ..... | 5.673.227,14 | ÷ 3.086.000,00 |
| 6408 | Oljugoymslur ..... | 791.343,10 | 900.000,00 |
| 6567 | Hvalastøðin við Áir ..... | ÷ 81.173,05 | : 50.000,00 |
| 6572 | Stórahús við Áir ..... | 12.000,00 | ÷ 60.000,00 |
| | | ÷53.608.096,83 | : 73.043.000,00 |
| (§ 7) | **Partur av avlopi danska tjóðarbankans samb. lóg:** | | |
| 7011 | Partur av avlopi tjóðarbankans ..... | 41.746.081,34 | 5.000.000,00 |
| (§ 8) | **Ymsar inntøkur:** | | |
| 8105 | Ymsar inntøkur..... | 892,09 | 5.000,00 |
| | Samantaldar inntøkur ..... | 1.135.104.721,46 | 1.001.572.000,00 |

# ÚTREIÐSLUR

| | | Roknskapur | Fíggjarlóg |
|---|---|---|---|
| (§ 10) | **Løgtingið:** | | |
| 10018 | Løgtingsmenn | 6.488.299,70 | 5.979.000,00 |
| 10106 | Løgtingshúsið | 362.910,45 | 510.000,00 |
| 10108 | Løgtingstíðindi og kunngerðarsavn | 717.826,50 | 520.000,00 |
| 10301 | Ekstern grannskoðan | 76.600,00 | 75.000,00 |
| 10403 | Intern grannskoðan | 1.191.377,25 | 1.117.000,00 |
| 10505 | Landsskattanevndin | 69.410,52 | 102.000,00 |
| 10607 | Norðurlandaráðið | 0 | 60.000,00 |
| 10709 | Norrønt samstarv | 0 | 90.000,00 |
| | | 8.906.424,42 | 8.453.000,00 |
| (§ 11) | **Landsfyrisitingin:** | | |
| 11015 | Løgmaður og landsstýri | 1.413.025,55 | 1.481.000,00 |
| 11053 | Landsskrivstovan | 6.621.746,06 | 6.169.000,00 |
| 11103 | Fiskivinnustovan | 803.165,02 | 700.000,00 |
| 11155 | Uttanríkistænasta í Aberdeen | 425.007,69 | 418.000,00 |
| 11205 | Uttanríkistænasta í Keypmannahavn | 620.499,45 | 557.000,00 |
| 11257 | Líkningarráð Føroya | 4.566.361,17 | 4.344.000,00 |
| 11262 | Samtíðarskattaskipan | 7.421.363,19 | 7.393.000,00 |
| 11276 | Dataeftirlit | 0 | 175.000,00 |
| 11307 | Manntalsstovan | 758.340,18 | 749.000,00 |
| 11359 | Almannastovan | 5.282.790,84 | 4.650.000,00 |
| 11409 | Landsskúlafyrisitingin | 6.043.186,94 | 6.998.000,00 |
| 11452 | Føroya Gjaldstova, Tórshavn | 18.208.549,61 | 15.039.000,00 |
| 11466 | Føroya Gjaldstova, Klaksvík | 713.804,13 | 663.000,00 |
| 11471 | Føroya Gjaldstova, Saltangará | 530.026,53 | 530.000,00 |
| 11485 | Føroya Gjaldstova, Fuglafirði | 410.121,88 | 413.000,00 |
| 11499 | Føroya Gjaldstova, Tvøroyri | 483.323,46 | 488.000,00 |
| 11502 | Føroya Gjaldstova, Vágur | 386.522,74 | 387.000,00 |
| 11516 | Føroya Gjaldstova, Sørvágur | 361.446,74 | 375.000,00 |
| 11549 | Endurgj. til sýslur f. skrivstovuh. | 60.873,50 | 40.000,00 |
| 11554 | Tolleftirlitið | 2.958.233,06 | 2.937.000,00 |
| 11568 | Trygdareftirlitið | 279.699,47 | 400.000,00 |
| 11604 | Valuta- og prísráð Føroya | 706.824,91 | 887.000,00 |
| 11656 | Lønarráðið | 3.723,96 | 6.000,00 |
| 11661 | Heilsu- og heimasjúkrasystraskipanin | 238.942,09 | 317.000,00 |
| 11706 | Búskaparráð | 1.798.656,10 | 1.987.000,00 |
| | at flyta . | 61.096.234,27 | 58.103.000,00 |

| | | | Roknskapur | Fíggjarlóg |
|---|---|---|---|---|
| | | flutt ... | 61.096.234,27 | 58.103.000,00 |
| 11758 | Ferða- og dagpeningur | | 2.779.356,81 | 2.200.000,00 |
| 11808 | Innheintingarútreiðslur | | 153.994,61 | 50.000,00 |
| 11851 | Ognin Tinganes | | 1.351.165,99 | 1.713.000,00 |
| 11901 | Landsverkfrøðingsskrivstovan | | 7.938.943,89 | 8.079.000,00 |
| 11953 | Umsitingarhús í grunn | | 1.000.000,00 | 1.000.000,00 |
| | | | 74.319.695,57 | 71.145.000,00 |
| (§ 12) | **HEILSUMÁL:** | | | |
| 12109 | **Landssjúkrahúsið:** | | | |
| | Útreiðslur | | 145.424.536,78 | 135.649.000,00 |
| | ÷sjúklingagjald | 257.030,00 | | ÷231.000,00 |
| | ÷ríkisstudningur | 80.896.983,06 | | ÷75.724.000,00 |
| | ÷húsaleiga o.a. | 2.504.165,65 | ÷83.658.178,71 | ÷2.543.000,00 |
| | | | 61.766.358,07 | 57.151.000,00 |
| 12202 | **Klaksvíkar sjúkrahús:** | | | |
| | Útreiðslur | | 32.725.854,77 | 29.525.750,00 |
| | ÷sjúklingagjald | 192.900,00 | | ÷191.000,00 |
| | ÷ríkisstudning | 16.165.923,91 | | ÷14.783.750,00 |
| | ÷húsaleiga | 201.106,95 | ÷16.559.930,86 | ÷188.000,00 |
| | | | 16.165.923,91 | 14.363.000,00 |
| 12304 | **Suðuroyar sjúkrahús:** | | | |
| | Útreiðslur | | 15.693.060,92 | 14.345.750,00 |
| | ÷ymiskar inntøkur | 121.652,34 | | ÷75.000,00 |
| | ÷ríkisstudning | 7.785.704,29 | ÷7.907.356,63 | ÷7.344.750,00 |
| | | | 7.785.704,29 | 6.926.000,00 |
| 12406 | Heilsumiðstøðir í grunn | | 1.000.000,00 | 1.000.000,00 |
| 12508 | Læknar | | 479.317,39 | 516.000,00 |
| 12601 | Ljósmøður | | 0 | 1.122.000,00 |
| 12653 | Heimasjúkrasystraskipanin | | 2.916.514,78 | 2.760.000,00 |
| 12672 | Skúlalæknar | | 104.122,10 | 267.000,00 |
| | | at flyta ... | 4.499.954,27 | 5.665.000,00 |

| | | | Rokn skapur | Fíggjarlóg |
|---|---|---|---|---|
| | | flutt ... | 4.499.954,27 | 5.665.000,00 |
| 12907 | Ymiskar útreiðslur: | | | |
| | Fursóttir | | 35.763,41 | 45.000,00 |
| | Karantenuútreiðslur | | 0 | 1.000,00 |
| | Sjúkrahjálp | | 4.508,00 | 2.000,00 |
| | Hvíldarheimið »NAINA« | | 1.491.701,03 | 500.000,00 |
| | Ferðaútreiðslur til barnakonur | | 1.054,00 | 0,00 |
| | Blákrosstovan | | 277.500,00 | 300.000,00 |
| | | | 92.028.466,98 | 84.953.000,00 |
| (§ 13) | **SAMFERDSLUMÁL:** | | | |
| 3000-5900 | Nýggir vegir og brýr, breiðkan av brúm og umsiting | | 141.609.054,92 | 135.000.000,00 |
| | ÷endurgjald f. komm. | 9.589.676,00 | | ÷ 8.500.000,00 |
| | ÷fíggjað úr grunni | 28.537.890,33 | | ÷23.000.000,00 |
| | ÷fíggjað við lánum | 43.000.000,00 | ÷81.127.566,33 | ÷43.000.000,00 |
| | | | 60.481.488,59 | (60.500.000,00) |
| | **Játtanir í grunnar:** | | | |
| 13023 | Havnagerð | | 48.800.000,00 | 48.800.000,00 |
| 13037 | Lendingar | | 23.000.000,00 | 23.000.000,00 |
| 13042 | Flogferðsla | | 3.500.000,00 | 3.500.000,00 |
| 13061 | Berghols- og brúgvagerð | | 14.000.000,00 | 14.000.000,00 |
| 13075 | Studningur til komm. til asfaltering | | 6.500.000,00 | 6.500.000,00 |
| 13089 | Byggi- og rakstrargr. Postverksins | | 3.000.000,00 | 3.000.000,00 |
| 13094 | Sekunder berghol | | 4.000.000,00 | 4.000.000,00 |
| 13158 | Eyka 6-ára havnaætlan 1978/84 | | 8.000.000,00 | 8.000.000,00 |
| | | | 171.281.488,59 | 171.300.000,00 |
| (§ 14) | **SKÚLAMÁL:** | | | |
| 14053 | Felagsútr. fyri skúlaverkið | | 183.539,70 | 338.000,00 |
| 14103 | **Fólkaskúlin:** | | | |
| | Læraralønir | 96.140.205,44 | | 92.762.000,00 |
| | Læraraeftirlønir | 7.203.071,76 | | 7.650.000,00 |
| | Skúlabarnafluttningur | 2.978.081,51 | | 7.875.000,00 |
| | Ymiskt 100% statskassin | 10.706.997,01 | | 0 |
| | ÷endurgj. f. ríkiskass | ÷70.663.910,76 | | ÷59.108.000,00 |
| | ÷endurgj. f. komm. | : 0 | | ÷ 3.938.000,00 |
| | | at flyta ... | 46.364.444,96 | (45.241.000,00) |

| | | Roknskapur | Fíggjarlóg |
|---|---|---|---|
| | Flutt ... | 46.364.444,96 | (45.241.000,00) |
| 14155 | HF-skeiðið í Suðuroy ..... | 2.493.733,62 | 2.665.000,00 |
| 14169 | HF-skeið í Klaksvík ..... | 2.210.809,27 | 2.342.000,00 |
| 14174 | Studenta- og HF-skeiðið, Gøta ..... | 6.052.643,74 | 8.110.000,00 |
| 14205 | Studenta- og HF-skeiðið, Tórshavn..... | 15.426.448,58 | 15.951.000,00 |
| 14257 | Kostdeild Studentaskúlans ..... | 1.965.630,19 | 2.152.000,00 |
| 14307 | Føroya Sjómansskúli ..... | 4.307.161,36 | 4.300.000,00 |
| 14409 | Klaksvíkar Sjómansskúli ..... | 1.147.747,88 | 1.300.000,00 |
| 14502 | Føroya Fólkaháskúli ..... | 1.709.480,00 | 1.762.000,00 |
| 14554 | Húsarhaldsskúlar ..... | 600.000,00 | 430.000,00 |
| 14604 | Kvøldskúlar ..... | 1.146.558,16 | 1.563.000,00 |
| | | 83.608.197,46 | 86.154.000,00 |
| 14901 | **Ítróttur:** | | |
| | Lánigrunnur til ítróttaranlegg ..... | 100.000,00 | 100.000,00 |
| | Studningur til Í.S.F. ..... | 1.250.000,00 | 1.250.000,00 |
| | Studningur til ferðir innanoyggja ..... | 1.019.669,00 | 500.000,00 |
| 14953 | **Ymiskir studningar:** | | |
| | Grunnur til lærdan lestur ..... | 880.000,00 | 880.000,00 |
| | Grunnur til annan lestur ..... | 175.000,00 | 175.000,00 |
| | Grunnur til lærlingar ..... | 200.000,00 | 200.000,00 |
| | Landbúnaðarnæmingar ..... | 20.000,00 | 40.000,00 |
| | Ymisk framhaldsundirvísing ..... | 18.005,00 | 15.000,00 |
| | Skúlabarnaferðir uttanlanda ..... | 60.540,00 | 60.000,00 |
| | Skúlabarnaferðir innanoyggja ..... | 421.688,00 | 450.000,00 |
| | Ítróttar- og skúlabyggigrunnur ..... | 5.000.000,00 | 5.000.000,00 |
| | Sjómansskúli í grunn ..... | 500.000,00 | 500.000,00 |
| | Næmingastudningur til listamenn ..... | 35.000,00 | 35.000,00 |
| | Føroya Skúlasavn ..... | 70.000,00 | 70.000,00 |
| | Meginfelag føroysku studenta..... | 90.000,00 | 85.000,00 |
| | Norrøna Felagið ..... | 25.000,00 | 25.000,00 |
| | Studn. til fremmand, ið lesa í Føroyunum | 22.000,00 | 25.000,00 |
| | Landsskúlafyris. at ráða yvir ..... | 2.240,00 | 26.000,00 |
| | Eftirútbúgving av handverkarum ..... | 186.415,00 | 200.000,00 |
| | Studentaskúli/HF-skeið, Eysturoy í grunn ..... | 2.500.000,00 | 0 |
| | Landsstýrinum at ráða yvir ..... | 286.095,33 | 200.000,00 |
| | | 96.469.849,79 | 95.990.000,00 |

| | | Roknskapur | Figgjarlóg |
|---|---|---|---|
| (§ 15) | **VÍSIND, BÓKMENTIR OG LIST:** | | |
| 15109 | Føroya Landsbókasavn | 2.373.631,23 | 2.492.000,00 |
| 15202 | Fólkabókasøvn | 3.082.099,13 | 3.332.000,00 |
| 15304 | Landsskjalasavn | 871.873,65 | 988.000,00 |
| 15406 | Føroya Fornminnissavn | 3.096.661,96 | 3.088.000,00 |
| 15508 | Bygdasøvn | 216.347,50 | 198.000,00 |
| 15551 | Fiskirannsóknarstovan | 8.445.627,19 | 8.547.000,0 |
| 15653 | Fuglakanningarstøð | 26.923,81 | 20.000,00 |
| 15703 | Føroya Náttúrugripasavn | 1.441.255,88 | 1.425.000,00 |
| 15717 | Danmarks Geolog. Undersøgelse | 474.283,13 | 472.000,00 |
| 15722 | Jarðfrøðisligar boringar | 251.078,00 | 0 |
| 15755 | Fróðskaparsetur Føroya | 4.896.585,35 | 4.657.000,00 |
| 15793 | Stovnar á Debesartrøð | 1.014.295,46 | 1.147.000,00 |
| 15805 | Heilsufrøðilig Starvsstova | 1.876.260,03 | 1.876.000,00 |
| 15857 | Náttúrufriðingarnevndin | 199.574,52 | 100.000,00 |
| 15895 | Tónleikur og sangur | 772.837,22 | 675.000,00 |
| 15907 | **Ymiskir studningar:** | | |
| | Barnabløð | 30.000,00 | 30.000,00 |
| | Sjónleikur | 267.000,00 | 250.000,00 |
| | Til útgávu av barnabókum | 450.000,00 | 450.000,00 |
| | Sømdarpeningur til skald og listafólk | 85.000,00 | 85.000,00 |
| | Lánigrunnur til bókaútgávu | 100.000,00 | 100.000,00 |
| | Skúlabókaútgáva | 900.000,00 | 900.000,00 |
| | Norðurlandahús í grunn | 2.533.000,00 | 2.533.000,00 |
| | Sjónleikarhús í grunn | 75.000,00 | 75.000,00 |
| | Fornminnissøvn í grunn | 200.000,00 | 200.000,00 |
| | Bókamiðsølan | 250.000,00 | 250.000,00 |
| | Orðabókaútgáva | 96.000,00 | 96.000,00 |
| | Útvarpssendist. í grunn | 2.500.000,00 | 2.500.000,00 |
| | Ungdóms- og bygdahús í grunn | 500.000,00 | 500.000,00 |
| Brunatrygging | 17.978,60 | 35.000 | 20.000 |
| Leiga | 800.584,25 | 550.000 | 930.000 |
| Reingerð o.a. | 937.197,48 | 1.000.000 | 1.040.000 |
| Viðlíkahald | 450.502,43 | 500.000 | 1.110.000 |
| Aðrar útreiðslur | 1.891,00 | 10.000 | 10.000 |
| | **2.665.747,45** | **2.495.000** | **3.650.000** |

| Rakstur av akførum | Rokn.skapur 1982/83 | Rakstrarætl. 1983/84 | Rakstrarætl. 1984/85 |
|---|---|---|---|
| Bensin og smyrjiolja | 265.178,09 | 275.000 | 305.000 |
| Trygging og vegskattur | 76.091,00 | 40.000 | 97.000 |
| Viðlíkahald | 321.522,55 | 325.000 | 300.000 |
| | **662.791,64** | **640.000** | **702.000** |

| Aðrar útreiðslur | Rokn.skapur 1982/83 | Rakstrarætl. 1983/84 | Rakstrarætl. 1984/85 |
|---|---|---|---|
| Keyp av eyðkennisbúnum | 57.050,00 | 75.000 | 60.000 |
| Rakstrargøgn | 535.046,24 | 150.000 | 300.000 |
| Tænastuferðir | 149.737,52 | 150.000 | 150.000 |
| Lndurgjald fyri postsendingar | 81.004,41 | 50.000 | 100.000 |
| Kassamunir | 24.174.97 | 40.000 | 40.000 |
| Løn til revisión | 189.800,00 | 175.000 | 200.000 |
| Húsfólka-vanlukku-trygging | 89.398,92 | 90.000 | 100.000 |
| Útbúgving | 96.842,11 | 175.000 | 200.000 |
| Annað | 24.125,72 | 48.500 | 44.000 |
| | **1.247.179,89** | **953.500** | **1.194.000** |

**Ad § 6 - 6567 Hvalastøðin við Áir**

*Sbrt. skriv frá Teknisku deild í Landsstýrinum:*

**Viðvíkjandi Hvalastøðini við Áir**

Føroya Landsstýri hevur á fundi tann 20. juli 1983 viðtikið, at tað fram vegis skal verða gjørligt at taka stórhval uppá land norðuri við Áir.

Fyri at hetta skal verða møguligt, so er neyðugt at neyðugar ábøtur og viðlíkahald støðugt fara fram bæði uppá hús og maskinur, tí støð-

**Driftin í dag:**
Nú er tað so, at í dag verður bert tvøstið av hvalinum brúkt og liggur tað um ca. 20-25%.

Restin, spikið, garnar og beinagrind, má tí fáast burtur onkursvegna, tí tað kann ikki liggja og rotna.

Hinvegin, tá ið talan bert er um smáar nøgdir av hvalum, sum verða skotnir, so verður ikki mett, at tað lønar seg at útnytta spikið kommersielt.

Herman Hermansen o.a., sum í nøkur ár hava skotið hval og viðgjørt hann við Áir, hava tí funnið uppá, fyri at loysa hendan spurning við restini, at kóka spikið og garnarnar, fyri síðan at brenna tað útvunna við lýsi í dampketlinum.

Hetta kann tykjast eitt sindur øvugt, men er so ein máti at sleppa av við restina uppá, og tá ið dampketilin kann brenna lýsi, so verður lítil og ongin olja brúkt.

Sjálv beinagrindin verður togað út og søkt.

Aftaná sýn tann 23. august 1983 saman við I.I. Hermansen bleiv tað konstaterað:
at upphálingarspølini virka
at planurin er inntaktur
at dampketilin virkar
at møguligt er at kóka spikið.

Men samstundis bleiv eisini konstaterað, at húsini eru í sera ringum standi og treingja til ábøtur, um tey skulu standa leingi afturat. Samstundis var ógvuliga óruddiligt naestan allastaðni.

Vit vilja tí skjóta upp, at hesar ábøtur verða gjørdar á húsini beinatvegin.

**1. Centrifugurúm: nr. 7 á teknig**

Tætta takið + 1-2 lektir útskiftast.
Nýggja hurð + vindeyga í norðaru síðu.
Sunnara síða lokast hurð + vindeyga.
Mett til ..... kr. 15.000.00

**2. Goymslurúm: nr. 5 á teknig**

[illegible]

**3. Lýsitangahús: nr. 8 á tekning**

Nýggjan klædning + nakað av stórviði á norðaru síðu.
Trappa upp til tangarnar umvælast. Mett til ..... kr. 22.000,00

**4. Turkan: nr. 21 á tekning**

Her verður roknað við, at ein tilbygningur norðureftir nr. 22 verður tikin niður, og síðan verða hesi arbeiðir gjørd:
Nýtt tak á nr. 21 tann partin uttan reising ca. 50 m² + 2-3 nýggjar sperrur.
Nýggjur endaveggur norðureftir, roknað verður við stoyptum sokli 1 m upp, og restin timbur klædt við jarni.

Suðursíðan:

Verðandi lúkur umvælast og klædast við jarni.
Mett til ..... kr. 40.000,00

**5. Spikkókari: nr. 23 á tekning**

Her er takið dottið niður, so hetta stendur sum ein ruin beint út móti planinum.
Okkara uppskot er, at eitt plankaverk verður uppsett í verandi vegg út móti planinum, og at hetta rúmið síðan verður nýtt sum skrottdungi.
Mett til ..... kr. 8.000,00

**Støðin sum so:**

6. Alt økið eigur at ruddast, og lás eigur at verða sett á tann verandi bummin á vegnum oman til støðina, so bert teir, sum arbeiða har, hava atgongd.
Stongt eigur at verða um náttina.
Mett til ..... kr. 12.000,00

Arbeiðið alt mett til ..... **kr. 105.000,00**

Vit vænta at hoyra aftur um [illegible]

**Viðmerking landsstýrisins:**
Umframt omanfyri nevndu 105.000 kr. verður neyðugt at seta umleið 50.000 kr. av til viðlíkahald.

**Ad § 10 - 10018 Løgtingsmenn**

| Konto (1.000 kr.) | | Rokn-skapnr | Játtan | Uppskot stovnsins | Uppskot lands-stýrisins | Ætlan | Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 1982 | 1983/84 | 1984/85 | 1984/85 | 1985/86 | 1986/87 |
| 103015 | Løn/løgtingsmenn | 5.307 | 4.560,0 | 4.840,8 | 4.840,8 | 4.840,8 | 4.840,8 |
| 103151 | Avloysarar | 184 | 100,0 | 185,0 | 185,0 | 185,0 | 185,0 |
| 103509 | Samsýningar (nevndarsamsýn.) | 267 | 135,0 | 200,0 | 200,0 | 200,0 | 200,0 |
| 113107 | Vistarhald løgtingsmenn | 14 | 1.039,0 | 1.050,0 | 1.050,0 | 1.050,0 | 1.050,0 |
| 113202 | Ferða- og dagpeningur | 69 | 85,0 | 90,0 | 90,0 | 90,0 | 90,0 |
| 253609 | Formannskapinum at ráða yvir | 55 | 60,0 | 70,0 | 70,0 | 70,0 | 70,0 |
| | | **5.896** | **5.979,0** | **6.435,8** | **6.435,8** | **6.435,8** | **6.435,8** |

**Viðmerkingar:**

Ad konto 103015 Løn/løgtingsmenn: 32 løgtingsmenn 146.123,- kr. = 4.675.848 kr.
formaður, skrivari o.a. 165.000 kr.
**4.840.848 kr.**

Ad konto 113107 Vistarhaldspeningur:
Av tí at tað er valár, er upphæddin ætlað **1.050.000 kr.**

| Konto (1.000 kr.) | | Rokn-skapur | Játtan | Uppskot stovnsins | Uppskot landsstýrisins | Ætlan | Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 1982 | 1983/84 | 1984/85 | 1984/85 | 1985/86 | 1986/87 |
| 103142 | Løn/starvsfólk | 0 | 140,0 | 140,0 | 140,0 | 140,0 | 140,0 |
| 103222 | Løn/reingerð | 112 | 75,0 | 85,0 | 85,0 | 85,0 | 85,0 |
| 103288 | Løn/ønnur | 7 | 40,0 | 40,0 | 40,0 | 40,0 | 40,0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 66 | 85,0 | 85,0 | 85,0 | 85,0 | 85,0 |
| 213408 | Umvælingar v.m. | 119 | 60,0 | 335,0 | 335,0 | 80,0 | 80,0 |
| 233354 | Telefon og telex | 21 | 60,0 | 60,0 | 60,0 | 60,0 | 60,0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 54 | 50,0 | 60,0 | 60,0 | 60,0 | 60,0 |
| | | **379** | **510,0** | **805,0** | **805,0** | **550,0** | **550,0** |

**Viðmerkingar:**
Konto 103142: Hesar 140.000 eru ætlaðar til upprit av munnliga orðaskiftinum á tingi.
Konto 103222: Løn/reingerð av løgtingsins og gamla apotekinum.
Konto 213105: El, hiti og vask av løgtingshúsinum og gamla apotekinum.
Konto 213408: Umvæling v.m. av løgtingshúsinum og gamla apotekinum (takið).

| (1.000 kr.) | Rokn-skapur | Játtan | Uppskot stovnsins | Uppskot landsstýrisins | Ætlan | Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1982 | 1983/84 | 1984/85 | 1984/85 | 1985/86 | 1986/87 |
| Ymiskar inntøkur | + 13 | + 5,0 | + 12,0 | + 12,0 | + 12,0 | + 12,0 |
| Prenting | 482 | 525,0 | 600,0 | 600,0 | 600,0 | 600,0 |
| | **469** | **500,0** | **588,0** | **588,0** | **588,0** | **588,0** |



**Ad § 10 - 10403 Intern grannskoðan**

*Sbrt. skriv dagfest 30. sept. 1983:*

Sum svar uppá skriv landsstýrisins dagfest 11. august 1983 meti eg neyðugu útreiðslurnar til internu grannskoðanina fyri 1984/85 fara at verða hesar:

| Kontonummar og navn | Rokn-skapur | Játtan | Uppskot stovnsins | Uppskot lands-stýrisins | Ætlan | Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | 1985/86 | 1986/87 |
| | 1982 | 1983/84 | 1984/85 | 1984/85 | í 1.000 kr. | í 1.000 kr. |
| 103048 Løn tænastufólk | 175.391,44 | 181.000 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 103143 — starvsfólk | 769.176,94 | 781.900 | 1.120.671 | 1.120.671 | 1.120.671 | 1.120.671 |
| 103222 — reingerð | 33.149,79 | 35.000 | 38.152 | 38.152 | 38.152 | 38.152 |
| 103509 Samsýningar | 7.783,00 | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 |
| 113202 Ferða- og dagpeningur | 5.986,30 | 5.000 | 7.000 | 7.000 | 7.000 | 7.000 |
| 213105 El, hiti og vask | 2.288,07 | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 |
| 213901 Ymiskar húsaútreiðslur | 6.611,00 | 6.000 | 7.000 | 7.000 | 7.000 | 7.000 |
| 233051 Innbúgv | 4.659,50 | 6.500 | 12.000 | 12.000 | 12.000 | 12.000 |
| 233155 Prentlutir | 2.012,86 | 8.000 | 8.000 | 8.000 | 8.000 | 8.000 |
| 233259 Postgjald | 1.563,76 | 3.500 | 3.500 | 3.500 | 3.500 | 3.500 |
| 233354 Telefon & telex | 9.115,00 | 14.500 | 18.000 | 18.000 | 18.000 | 18.000 |
| 233409 Leiga av maskinum | 14.199,00 | 11.100 | 11.100 | 11.100 | 11.100 | 11.100 |
| 233553 EDV útreiðslur | 55.084,45 | 40.000 | 62.000 | 62.000 | 62.000 | 62.000 |
| 233561 Aðrar skrivstovuútreiðslur | 10.488,10 | 9.500 | 15.000 | 15.000 | 15.000 | 15.000 |
| | **1.097.509,20** | **1.117.000** | **1.317.423** | **1.317.423** | **1.317.423** | **1.317.423** |

Útreiðslurnar fyri 1985/86 og 1986/87 meti eg ikki koma at broytast munandi, roknast má tó við vanligum dýrtíðarhækkingum.

## Viðmerkingar

**Ad konto 103143 Løn starvsfólk**
Samsvarandi ynski frá Føroya Landsstýri havi eg eftirlikað, at ein starvsmaður í 9. lønarflokki í december 1982 bleiv fluttur frá Fiskivinnustovuni og kom at arbeiða fyri internu revisiónina. Lønarútreiðslurnar hjá hesum manni eru tiknar við í fíggjarlógaruppskotinum hjá revisiónini fyri 1984/85. Talan er tó ikki um nakra nýnormering innan almennu umsitingina, bert ein flytan av játtanini frá Fiskivinnustovuni.

Roknað er við 2 normeringum í 20. lønarflokki. Av hesum er onnur fyri tænastukvinnu, sum fór úr starvi 1. juli 1983. Her er talan um eina sparing í lønarútreiðslunum uppá kr. 21.600,- árliga. Hin normeringin er ein uppflyting frá endaløn í 15. lønarflokki. Í hesum føri er ein meirútreiðsla í lønin uppá ca. kr. 1.800,- árliga.

Annars er roknað við galdandi lønum (juli 1983), aldursviðbótum, 4 dýrtíðarviðbótum og 1,5% feriuendurgjald.

**Ad konto 103222 Løn reingerð**
Samsvarandi galdandi skipan verður løn reingerð, tils. kr. 114.456,- býtt við ½ ella kr. 38.152,- til Grannskoðannardeildina og ½ ella kr. 76.304,- til Løgtingið.

Løgtingsins partur verður at játta undir reingerð hjá Løgtinginum. Grannskoðannardeildin leggur alla lønina út. Løgtingsins partur verður fluttur, tá fíggjarárið endar.

**Ad konto 103509 Samsýningar**
Samsýning til leysa hjálp til maskinskriving v.m. av ársfrágreiðingini.

**Ad konto 213105 El, hiti og vask**
Løgtingsins partur til vindeygavask v.m. er mettur til kr. 10.000,-.

**Ad konto 213901 Ymiskar húsaútreiðslur**
Útreiðslurnar til vaktartænastuna til Gamla Apotek og Løgtingshúsið eru kr. 15.000,- árliga. Løgtingsins partur er kr. 12.500,-.

**Ad konto 233051 Innbúgv**
Hækkingin á hesi konto stendst av, at eg væntí tað verða neyðugt at keypa eina skrivimaskinu og eina roknimaskinu til stovnin.

**Ad konto 233354 Telefonútreiðslur**
Hækkingin kemur m.a. av 25% hækkan av telefongjøldunum frá 1/10-1983.

**Ad konto 233553 EDV útreiðslur**
Samsvarandi nýggja uppgerð frá Føroya Gjaldstovu er fasta árliga gjaldið til Føroya Gjaldstovu mett at verða ca. kr. 62.000,-.

**Ad konto 103143 Starvsfólk**
1 stovnsleiðari og 7 starvsfólk. Haruppii er eitt starvsfólk flutt frá Fiskivinnustovuni.

**Ad § 10 - 10505 Landsskattanevndin**

*Sbrt. skriv dagfest 20. oktober 1983:*

Viðlagt sendi eg uppskot til fíggjarlógina 1984/85 viðvikjandi stovninum Landsskattanevndin.

| Kontonummar og navn | | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 103509 | Samsýning, formann | 12.000 | 15.000 | 12.000 | 12.0 | 12.0 |
| 103509 | Samsýning, skrivaran | 35.000 | 35.000 | 35.000 | 35.0 | 35.0 |
| 113243 | Ferða- og dagpening uttanl. | 0 | 0 | 0 | 0.0 | 0.0 |
| 113202 | Ferða- og dagpening innanl. | 44.000 | 50.000 | 44.000 | 44.0 | 44.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 8.000 | 12.000 | 8.000 | 8.0 | 8.0 |
| | | **99.000** | **112.000** | **99.000** | **99.0** | **99.0** |

## Ad § 11 - 11015 Løgmaður og landsstýri

| Konto (1.000 kr.) | | Rokn-skapur | Játtan | Uppskot stovnsins | Uppskot landsstýris | Ætlan | Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 1982 | 1983/84 | 1984/85 | 1984/85 | 1985/86 | 1986/87 |
| 103023 | Løn/landsstýrismenn | 1.262 | 1.291,0 | 1.295,0 | 1.295,0 | 1.295,0 | 1.295,0 |
| 203507 | Umboðan | 45 | 50,0 | 50,0 | 50,0 | 50,0 | 50,0 |
| 203602 | Borðfæ | 32 | 30,0 | 35,0 | 35,0 | 35,0 | 35,0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 102 | 80,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 |
| 233051 | Innbúgv | 8 | 30,0 | 30,0 | 30,0 | 30,0 | 30,0 |
| | | **1.449** | **1.481,0** | **1.510,0** | **1.510,0** | **1.510,0** | **1.510,0** |

## § 11 - 11053 Landsskrivstovan

| Konto (1.000 kr.) | | Rokn-skapur | Játtan | Uppskot stovnsins | Uppskot landsstýrisins | Ætlan | Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 1982 | 1983/84 | 1984/85 | 1984/85 | 1985/86 | 1986/87 |
| 103048 | Løn/tænastaumenn | 808 | 813,1 | 833,8 | 833,8 | 833,8 | 833,8 |
| 103143 | Løn/starvsfólk | 1.964 | 2.100,0 | 2.200,0 | 2.200,0 | 2.200,0 | 2.200,0 |
| 103151 | Løn/avloysarar | 84 | 130,0 | 190,0 | 190,0 | 190,0 | 190,0 |
| 103168 | Løn/sáttmálaløn | 1.921 | 1.712,9 | 2.046,4 | 2.226,4 | 2.226,4 | 2.226,4 |
| 103288 | Løn/onnur | 0 | 47,0 | 47,0 | 47,0 | 47,0 | 47,0 |
| 103405 | Løn/úrtíðir | 8 | 30,0 | 30,0 | 30,0 | 30,0 | 30,0 |
| 113202 | Ferða- og dagpeningur innanl. | 0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| 123103 | Skeið | 0 | 25,0 | 35,0 | 35,0 | 35,0 | 35,0 |
| 203308 | Lýsingar | 15 | 20,0 | 22,0 | 22,0 | 22,0 | 22,0 |
| 233051 | Innbúgv | 28 | 70,0 | 95,0 | 95,0 | 95,0 | 95,0 |
| 233155 | Prentlutir | 31 | 15,0 | 40,0 | 40,0 | 40,0 | 40,0 |
| 233259 | Postgjald | 65 | 65,0 | 70,0 | 70,0 | 70,0 | 70,0 |
| 233354 | Telefon og telex | 223 | 382,0 | 400,0 | 400,0 | 400,0 | 400,0 |
| 233409 | Leiga av maskinum | 64 | 90,0 | 90,0 | 90,0 | 90,0 | 90,0 |
| 233504 | Sakkøn hjálp | 56 | 50,0 | 50,0 | 50,0 | 50,0 | 50,0 |
| 233512 | Tekstviðgerðartól | 0 | 369,0 | 360,0 | 360,0 | 360,0 | 360,0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 352 | 250,0 | 275,0 | 275,0 | 275,0 | 275,0 |
| | | **5.619** | **6.169,0** | **6.784,0** | **6.964,0** | **6.964,0** | **6.964,0** |

# *Síða 240 manglar*

| Kontonummar og navn | | Rokn-skapur | Játtan | Uppskot stovnsins | Uppskot landsstýrisins | Ætlan | Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **11103** | **-Fiskivinnustovan** | **1982/83** | **1983/84** | **1984/85** | **1984/85** | **1985/86** í 1.000 kr. | **1986/87** í 1.000 kr. |
| 103048 | Løn tænastumenn | 230.000 | 215.000 | 235.000 | 235.000 | 235.0 | 235.0 |
| 103143 | Løn starvsfólk | 407.250 | 380.000 | 410.000* | 410.000 | 410.0 | 410.0 |
| 113202 | Ferða- og dagpen. innalands | 850 | 0 | 0 | 0 | 0.0 | 0.0 |
| 203308 | Lýsingar | 0 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 2.0 | 2.0 |
| 233051 | Innbúgv | 6.550 | 8.000 | 13.000 | 13.000 | 13.0 | 13.0 |
| 233155 | Prentlutir | 10.400 | 10.000 | 12.000 | 12.000 | 12.0 | 12.0 |
| 233259 | Postgjald | 2.530 | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.0 | 5.0 |
| 233354 | Telefon og telex | 30.800 | 70.000 | 70.000** | 70.000 | 70.0 | 70.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 18.150 | 10.000 | 20.000 | 20.000 | 20.0 | 20.0 |
| | | **706.530** | **700.000** | **767.000** | **767.000** | **767.0** | **767.0** |

*) 3 skrivstovufólk. Av hesum eitt flutt til Intern Grannskoðan, rakstrarstað § 10-10403. Sostatt verður søkt um eitt skrivstovustarv á fiskivinnustovuni.

**) Telefon, telex v.m. (Noreg, Canada, Ísland, Grønland, USSR, DDR, EF v.m.)

Viðmerkingar: Vegna ta stóru arbeiðsbyrðu, sum seinastu árini er áløgd fiskivinnustovuni, kann landsstýrið taka undir við, at hetta starvið verður sett, so fiskivinnustovan hevur sama starvsfólkatal sum frammanundan.

**Ad. § 11 - 11155 Uttanríkistænasta í Aberdeen**

*Sbrt. skriv dagf. 25. oktober 1983:*

Hjálagt verður sent landsstýrisins uppskot til fíggjarætlan fyri fíggjarárið 1984/85 og somuleiðis umbidnu ætlan fyri 1985/86 og 1986/87.

Sum kunnugt starvist eg framvegis einsamallur, men havi tó roynt at halda tað skrivliga arbeiðið so nøkulunda ajour, hóast sjálvandi aftur í farna ári hevur verið neyðugt at arbeiða yvirtíð, alt ov oftani verður sagt mær. *Hjálparmann/kvinnu um summarmánaðarnar* vildi eg fegin, at landsstýrið vildi játta mær. Tá ið eg havi verið burturstaddur á tænastuferð og í summarfrí, havi eg aftur í farna ári fingið harra O. Skarðhamar at verið avloysari á skrivstovuni. Eykaútreiðslurnar av hesum hava verið uml. kr. 23.000 í farna fíggjarári.

*Viðv. tænastumannahúsunum - 35 Harlaw Road,* so fari eg aftur at vísa til skriv mítt til landsstýrið dagf. 10.08.81, við tekn. o.ø., og vil eg ráða til at umvælingararbeiðið verður byrjað skjótast til ber, tí annars má roknast við, at meira verður at umvæla, tí húsini forfarast av at standa tóm, nú eru uml. 3 ár síðani nakar búði í teimum. . . . Fyri at halda tað so rudduligt sum gjørligt, hevur urtagarðsrøkt verið eins og í undanfarnu árum.

*Viðv. løn míni,* so meti eg, eftir umstøðum mínum, at eg eri løntur eftir ov lágari lr. - 27 (2), og fari tí at heita á landsstýrið um at gera so væl at flyta lønina upp á 30 (1) pr. 1. apríl 1984, og samstundis at hækka útiviðbótina við kr. 7.000 um árið. Nevnast kann, at eg hígartil onga samsýning havi fingið fyri hús, undangongumaður í starvinum hevi fritt hús. Til kunningar kann nevnast, at danskur handilsattachéur í London við styttri tænastutíð fær fritt hús eins og hita og ljós, herumframt eina útiviðbót uppá kr. 147.000 írokn. borðfæ kr. 27.000, sostatt kann ein ikki siga, at ynski mítt er ov høgt sett, og vóni eg, at háttvirda landsstýrið eftirlíkar ynski mínum.

| Kontonummar og navn | | Rokn-skapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103048 Løn/tænastumenn | | 163.600,61 | 173.0 | 190.0 | 180.0 | 180.0 | 180.0 |
| 103143 Løn/starvsfólk | | — | 0.0 | 0.0 | 0.0 | 0.0 | 0.0 |
| 103222 Løn/reingerð | (£375,00) | 5.405,06 | 5.0 | 6.5 | 6.5 | 6.5 | 6.5 |
| 113052 Útiviðbót | | 30.000,00 | 33.0 | 40.0 | 33.0 | 33.0 | 33.0 |
| 113202 Ferða- og dagpeningur | (£4247,99) | 62.063,03 | 45.0 | 65.0 | 65.0 | 65.0 | 65.0 |
| 213105 El, hiti og vask | (£411,30) | 5.785,71 | 6.0 | 6.5 | 6.5 | 6.5 | 6.5 |
| 213806 Leiguútreiðslur | (£800,00) | 11.420,22 | 24.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 |
| 213901 Ymiskar húsaútreiðslur | (£1779,89) | 26.935,86 | 25.0 | 28.0 | 28.0 | 28.0 | 28.0 |
| 233051 Innbúgv | (£170,75) | 2.397,75 | 4.0 | 4.0 | 4.0 | 4.0 | 4.0 |
| 233155 Prentlutir | | — | 2.0 | 2.0 | 2.0 | 2.0 | 2.0 |
| 233259 Postgjald | (£130,99) | 1.851,20 | 2.0 | 3.0 | 3.0 | 3.0 | 3.0 |
| 233354 Telefon/telex | (£7308,82) | 104.284,09 | 88.0 | 95.0 | 95.0 | 95.0 | 95.0 |
| 233561 Aðrar skrivstovu-útreiðslur | (£691,01) | 9.867,68 | 11.0 | 14.0 | 14.0 | 14.0 | 14.0 |
| | **(£15.915,75)** | **423.610,72** | **418.0** | **479.0** | **462.0** | **462.0** | **462.0** |

**Viðmerkingar:** **Konto 113202** - írokn. samsýning/avloysara = 37,6%.
**Konto 233354** - orsøkin til, at upphæddin er heldur størri enn játtanin er tann, at gjøldini hækkaðu nakað og økta arbeiðið á umboðsstovuni.

**Viðmerking landsstýrisins:**
Umsókn Sofus Poulsens um umnormering av lønini og regulering av útiviðbótini verður viðgjørd í landsstýrinum sum vanligt lønarmál, tí er avgerðin ikki tikin í samband við fíggjarlógaruppskotið.

**Ad § 11 - 11205 Umboðsskrivstovan í Keypmannahavn**

*Sbrt. skriv dagf. 24. okt. 1983:*

Við hesum verður sett fram uppskot um játtanina til stovnin fyri fíggjarárið 1984/85:

| Rs. nr. 11205 | | Rokn-skapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103143 | Løn/starvsfólk | 53.261.63 | 88.000 | 96.000 | 96.000 | 96.000 | 96.000 |
| 103168 | Løn/sáttmálalønt | 161.769.76 | 172.000 | 210.000 | 180.000* | 180.000 | 180.000 |
| 103222 | Løn/reingerð | 19.302.61 | 30.000 | 33.000 | 33.000 | 33.000 | 33.000 |
| 113052 | Útiviðbót | 45.000.000 | 45.000 | 48.000 | 45.000* | 45.000 | 45.000 |
| 113202 | Ferða- og dagpeningur | 55.808.16 | 65.000 | 70.000 | 70.000 | 70.000 | 70.000 |
| 203308 | Lýsingar | 10.442.32 | 6.000 | 7.000 | 7.000 | 7.000 | 7.000 |
| 203507 | Umboðan | 8.230.70 | 9.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 |
| 213105 | El, hiti og vask | 28.100.00 | 30.000 | 33.000 | 33.000 | 33.000 | 33.000 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 145.011.39 | 62.000 | 68.000 | 68.000 | 68.000 | 68.000 |
| 233051 | Innbúgv | 15.267.92 | 7.000 | 8.000 | 8.000 | 8.000 | 8.000 |
| 233259 | Postgjald | 3.346.00 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| 233354 | Telefon, telex | 33.380.25 | 28.000 | 32.000 | 32.000 | 32.000 | 32.000 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 18.855.75 | 12.000 | 12.000 | 12.000 | 12.000 | 12.000 |
| | | **607.776.49** | **557.000** | **630.000** | **597.000** | **597.000** | **597.000** |

*) Sambært serligt skriv til landsstýrið er søkt um umnormering av lønini til undirritaða pr. 1. apríl 1984, og at fastar reglur verða gjørdar fyri regulering av útiviðbótini.

**Viðmerking landsstýrisins:**
Tryggvi Johansen hevur í serligum skrivi søkt um umnormering av lønini og regulering av útiviðbótini. Hesin spurningur verður viðgjørdur í landsstýrinum sum onnur lønarmál, og tí er avgerðin ikki tikin í samband við fíggjarlógaruppskotið.

**Ad § 11 - 11257 Líkningarráð Føroya**

*Sbrt. skriv dagf. 3. november 1983:*

Eftir áheitan verður sent uppskot til fíggjarløgtingslóg 1984/85 fyri Líkningarráð Føroya, rakstrarstað nr. 11257.

| | | Rokn-skapur | Játtan | Uppskot stovnsins | Uppskot lands-stýrisins | Ætlan | Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 1982/83 | 1983/84 | 1984/85 | 1984/85 | 1985/86 | 1986/87 |
| | | | | | | í 1.000 kr. | í 1.000 kr. |
| 103048 | Løn/tænastumenn | 237.802 | 240.000 | 245.000 | 245.000 | 245.0 | 245.0 |
| 103143 | Løn/starvsfólk | 1.925.433 | 2.035.000 | 2.297.000 | 2.292.000 | 2.292.0 | 2.292.0 |
| 103151 | Løn/avloysarar | 43.533 | 290.000 | 480.000 | 480.000 | 480.0 | 480.0 |
| 103222 | Løn/reingerð | 54.866 | 92.000 | 101.000 | 101.000 | 101.0 | 101.0 |
| 103288 | Løn/onnur | 69.412 | 65.000 | 162.000 | 162.000 | 162.0 | 162.0 |
| 103405 | Úrlíðarløn | 49.897 | 130.000 | 143.000 | 143.000 | 143.0 | 143.0 |
| 103509 | Samsýningar | 12.000 | 18.000 | 18.000 | 18.000 | 18.0 | 18.0 |
| 103202 | Ferða- og dagp. innanl. | 18.936 | 28.000 | 65.000 | 65.000 | 65.0 | 65.0 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103243 | Ferða- og dagp. uttanl. | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 203308 | Lýsingar | 17.445 | 75.000 | 75.000 | 75.000 | 75.0 | 75.0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 31.937 | 27.000 | 45.000 | 45.000 | 45.0 | 45.0 |
| 213702 | Ognartrygging | 744 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 2.0 | 2.0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 186.594 | 200.000 | 264.000 | 264.000 | 264.0 | 264.0 |
| 213901 | Ymiskar húsaútreiðslur | 4.625 | 50.000 | 100.000 | 100.000 | 100.0 | 100.0 |
| 233051 | Innbúgv | 53.861 | 62.000 | 100.000 | 100.000 | 100.0 | 100.0 |
| 233155 | Prentlutir | 167.302 | 290.000 | 400.000 | 400.000 | 400.0 | 400.0 |
| 233259 | Postgjald | 26.297 | 60.000 | 200.000 | 200.000 | 200.0 | 200.0 |
| 233354 | Telefon og telex | 29.581 | 35.000 | 40.000 | 40.000 | 40.0 | 40.0 |
| 233409 | Leiga av maskinum | 26.290 | 155.000 | 200.000 | 200.000 | 200.0 | 200.0 |
| 233504 | Sakkøn hjálp | 158.900 | 250.000 | 250.000 | 250.000 | 250.0 | 250.0 |
| 233553 | EDV-útreiðslur | 0 | 165.000 | 192.000 | 192.000 | 192.0 | 192.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 50.198 | 75.000 | 83.000 | 83.000 | 83.0 | 83.0 |
| 233657 | Samtíðarskattur - forarb. | 314.452 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | | **3.480.107** | **4.344.000** | **5.457.000** | **5.457.000** | **5.457.0** | **5.457.0** |

**Viðmerkingar:**

**Ad. 103048 og 103143**

| | | |
|---|---|---|
| Stjóri | ..... | 245.000 |
| 1 fulltrúi | ..... | 161.900 |
| 1 fulltrúi | ..... | 161.900 |
| 1 fulltrúi | ..... | 160.100 |
| 1 fulltrúi | ..... | 158.300 |
| 1 starvsfólk | ..... | 140.300 |
| 1 — | ..... | 140.300 |
| 1 — | ..... | 133.100 |
| 1 — | ..... | 140.300 |
| 1 — | ..... | 140.300 |
| 1 — | ..... | 125.900 |
| 1 — | ..... | 147.500 |
| 1 — | ..... | 118.700 |
| 1 — | ..... | 70.100 |
| 1 — | ..... | 124.100 |
| 1 — | ..... | 116.900 |
| 1 — | ..... | 122.300 |
| 1 — | ..... | 130.000 |
| | | **2.537.000** |

Talið av starvsfólki er óbroytt, og er her bert talan um hækkanir sambært galdandi sáttmála og dýrtíðarviðgerð.

**Ad. 103151 og 103405**
Her er roknað við 4 fulltíðaravloysarum eyka, sum komandi ár skulu avloysa starvsfólk, ið burturav koma at arbeiða við umleggingini til samtíðarskattaskipan. Úrtíðarløtin er bert javnað samb. vegleiðingina.

**Ad. 103509**
Her er eingin broyting hend.

**Ad. 103222 reingerð**
**Ad. 213806 leiguútreiðslur**
**Ad. 213901 ymiskar húsaútreiðslur**
Líkningarráðið hevur nú yvirtikið tey høli, sum landsfólkayvirlitið

flutti úr, og somuleiðis eina hálva hædd í hinum bygninginum hjá P/f Marr og Co., sum ráðið vegna P/f Elektron hevur leigað í samb. við umleggingina. Sostatt verður roknað við størri løn til reingerð og størri húsaleiguútreiðslum orsakað av teimum fleiri m³. Somuleiðis er her roknað við, at broytingar verða at gera í verandi innrættan í ovaru hædd hjá ráðnum.

**Ad. 103288**
Her er roknað við at juristur í skattamátum skal arbeiða hálvan dag á stovninum.

**Ad. 103202**
Í samband við at arbeiðsgevaraeftirlitið er sett á stovn og kemur at virka frá 1. apríl 1984 má roknast við munandi størri útreiðslum eyka til hetta tiltakið.

**Ad. 233051**
Í samband við at ymiskar broytingar ætlandi verða gjørdar í verandi innrættan av skrivstovuhølunum, verður neyðugt at útskifta ein part av verandi skrivstovuinnbúgvi og maskinum, tá hetta er uppslitið.

**Ad. 203308 lýsingar**
**Ad. 233155 prentlutir**
**Ad. 233259 postgjald**
Hesir postarnir skulu síggjast undir einum, og standast hækkingarnar beinleiðis av samtíðarskattaskipanini. Umframt at skjøl skulu prentast bæði til forskotsskrásetingina, endaligu álikningina fyri 1983 og til arbeiðsgevaraeftirlitið, má her roknast við eini umfatandi informatión, so at skattaborgarin á besta hátt fær frágreiðing um eina so stóra broyting í skattaviðurskiftunum.

**Ad. 233504**
Sakkøn hjálp er óbroytt í mun til verandi játtan, men má roknast við eini slíkari upphædd eisini fyri komandi fíggjarár, tá skipanin neyvan kann roknast at verða útbygd endaliga í hesum fíggjarári.

**Ad. 233409**
On-line skipanin á ráðnum er nú útbygd, og verður hetta kostnaðurin av at leiga skermar og printarar. Somuleiðis er her roknað við kostnaðinum av verandi tekstviðgerðartóli.

**Ad. 233553**
Her er roknað við tí kostnaði, ið EDV-on-line skipanin førir við sær, so sum:

nýtsla av on-line skipanini,
programmbroytingar í tillagingartíðini,
EDV-útskriftir og
pappírsnýtsla.

**Viðmerking landsstýrisins:**
Landsstýrið skilar sær rætt til at flyta normeringar millum Líkningarráð Føroya, Føroya Gjaldstovu og Manntalsstovuna.

**Ad. § 11 - 11262: Samtíðarskattaskipan**

Uppskot landsstýrisins 1984/85 5.000.000,- kr.

Í fíggjarárinum 1983/84 eru játtaðar 7,4 milj kr. til samtíðarskattaskipanina. Við tað at arbeiðið er seinkað, og samtíðarskattaskipanin fyrst kemur í gildi 1. apríl 1984, verður heldur ikki allur peningurin, sum er játtaður í 1983/84 brúktur í hesum fíggjarárinum og verður tí neyðugt at flyta 3,5 milj. kr. av hesum peningi til fíggjarárið 1984/85.

Uppskot landsstýrisins er at játta 5,0 milj. kr. til rakstrarstað 11262 samtíðarskattaskipanina í fíggjarárinum 1984/85.

Uppí hesar 5 milj. kr. er roknað stovnsetan av 4 deildarskrivstovum úti um landið. Deildarskrivstovurnar verða at manna við fólki samsvarandi normering fyri Føroya Gjaldstovu og Líkningarráð Føroya.

Viðvíkjandi rakstrarútreiðslunum til samtíðarskattin verður víst til rakstrarstað 11452 Føroya Gjaldstovu og rakstrarstað 11257 Líkningarráðið.

Rakstrarstað 11262 samtíðarskattaskipanin kemur sostatt at fella burtur sum frálíður.

## Ad § 11 - 1307 Landsfólkayvirlitið

| Kouto | | Rokn-skapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan 1985/86 | Ætlan 1986/87 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103143 | Løn/starvsfólk | 280.703,11 | 300.000 | 310.000 | 310.000 | 310.000 | 310.000 |
| 103151 | Løn/avloysari | 9.008,10 | 13.000 | 20.000 | 20.000 | 20.000 | 20.000 |
| 103222 | Løn/reingerð | 11.863,63 | 15.000 | 20.000 | 20.000 | 20.000 | 20.000 |
| 103288 | Løn/onnur | 27.004,00 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 103405 | Úrtíðarløntir | 22.043,94 | 10.000 | 30.000 | 30.000 | 30.000 | 30.000 |
| 113202 | Ferða- og dagp. innanl. | 0 | 4.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 |
| 113243 | Ferða- og dagp. uttanl. | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 203308 | Lýsingar | 796,10 | 1.000 | 1.500 | 1.500 | 1.500 | 1.500 |
| 213105 | El, hiti og vask | 4.125,99 | 7.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 |
| 213702 | Tryggingar | 979,00 | 1.000 | 1.500 | 1.500 | 1.500 | 1.500 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 41.905,73 | 42.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 |
| 213901 | Ymiskar húsaútreiðslur | 0 | 2.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| 233051 | Innbúgv | 3.075,00 | 4.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 |
| 233155 | Prentlutir | 7.610,00 | 30.000 | 20.000 | 20.000 | 20.000 | 20.000 |
| 233259 | Postgjald | 4.159,60 | 85.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 |
| 233354 | Telefon og telex | 868,00 | 10.000 | 15.000 | 15.000 | 15.000 | 15.000 |
| 233409 | Leiga av maskinum | 0 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| 233553 | EDV útreiðslur | 500.997,14 | 212.000 | 253.000 | 253.000 | 253.000 | 253.000 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 6.201,65 | 12.000 | 6.000 | 6.000 | 6.000 | 6.000 |
| | | **921.340,99** | **749.000** | **806.000** | **806.000** | **806.000** | **806.000** |

**Viðmerkingar:**

**Ad. 103143 løn/starvsfólk**

| | | |
|---|---|---|
| Leiðari | Kr. 169.524,- | 26. lønarfl. |
| Assistentur | — 140.004,- | 9. lønarfl. |
| | **Kr. 309.528,-** | |

Roknað er við lønum galdandi 1. juli 1983 + 4 prístalsviðbótum og 1 aldursviðbót í fíggjarárinum 1984/85.

**Ad. 233553**

**EDV-útreiðslurnar koma fram á hendan hátt:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Leiga av EDV-tólum (2 terminalar og 2 printarar) | Kr. 43.000,- |
| 2. | Gjald fyri on-line tilknýti hjá P/F Elektron | — 30.000,- |
| 3. | Transmissiónir | — 70.000,- |
| 4. | Programmbroytingar | 60.000,- |
| 5. | Útskriftir | — 50.000,- |
| | | **Kr. 253.000,-** |

---

**Viðmerkingar frá landsstýrinum:**

Landsstýrið skilar sær rætt til at flyta normeringar millum Likningarráð Føroya, Føroya Gjaldstovu og Manntalsstovuna í samband við umleggingina til samtíðarskatt.

**Ad § 11 - 11359 Almannastovan**
*Sbrt. skrivi dagf. 24. okt. 1983:*

| Rakstrarstað 11359<br>Kontonummar og navn | Rokn-skapur<br>1982/83 | Játtan<br>1983/84 | Uppskot stovnsins<br>1984/85 | Uppskot landsstýrisins<br>1984/85 | Ætlan<br>1985/86<br>í 1.000 kr. | Ætlan<br>1986/87<br>í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 103143 Løn/starvsfólk | 2.575.500 | 3.030.000 | 3.658.800 | 3.495.900 | 3.495.9 | 3.495.9 |
| 103151 Løn/avloysarar | 100.500 | 85.000 | 137.600 | 137.600 | 137.6 | 137.6 |
| 103169 Løn/sáttmálalønt | 284.100 | 310.400 | 451.100 | 451.100 | 451.1 | 451.1 |
| 103222 Løn/reingerð | 83.100 | 158.900 | 244.200 | 171.300 | 171.3 | 171.3 |
| 103405 Úrtíðarløntir | 95.500 | 100.000 | 150.000 | 150.000 | 150.0 | 150.0 |
| 113202 Ferða- og dagp. innanl. | 4.700 | 10.000 | 15.000 | 15.000 | 15.0 | 15.0 |
| 113243 Ferða- og dagp. uttanl. | 0 | 25.000 | 0 | 0 | 0.0 | 0.0 |
| 123111 Skeið | 0 | 10.000 | 25.000 | 25.000 | 25.0 | 25.0 |
| 203303 Lýsingar | 9.000 | 15.000 | 20.000 | 20.000 | 20.0 | 20.0 |
| 213105 El, hiti og vask | 31.600 | 43.100 | 76.900 | 53.700 | 53.7 | 53.7 |
| 213806 Leiguútreiðslur | 107.800 | 182.600 | 335.500 | 235.000 | 235.0 | 235.0 |
| 213901 Ymiskar húsaútreiðslur | 200 | 100.000 | 250.000 | 100.000 | 100.0 | 100.0 |
| 233051 Innbúgv | 105.900 | 115.000 | 150.000 | 100.000 | 100.0 | 100.0 |
| 233155 Prentlutir | 68.500 | 200.000 | 250.000 | 250.000 | 250.0 | 250.0 |
| 233259 Postgjald | 128.100 | 160.000 | 170.000 | 170.000 | 170.0 | 170.0 |
| 233354 Telefon og telex | 60.900 | 100.000 | 115.000 | 115.000 | 115.0 | 115.0 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 233504 | Sakkøn hjálp | 0 | 10.000 | 20.000 | 20.000 | 20.0 | 20.0 |
| 233553 | EDV-útreiðslur | 426.000 | 400.000 | 510.000 | 510.000 | 510.0 | 510.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 76.000 | 75.000 | 120.000 | 120.000 | 120.0 | 120.0 |
| | Bruttoútreiðslur | 4.157.400 | 5.130.000 | 6.699.100 | 6.139.600 | 6.139.6 | 6.139.6 |
| 73057 | Endurgjald ríkið | 480.000 | 480.000 | 480.000 | 480.000 | 480.0 | 480.0 |
| | Nettoútreiðslur | 3.677.400 | 4.650.000 | 6.219.100 | 5.659.600 | 5.659.6 | 5.659.6 |

Vísandi til skriv landsstyrisins frá 11. august 1983, j. nr. 400-36, viðvíkjandi fíggjarlógaruppskoti fyri 1984/85, 1985/86 og 1986/87 viðvíkjandi rakstrinum av Almannastovuni senda vit hjálagt skjal I við samlaðu útreiðslunum og skjal II við sundurgreining av tølunum á, og kostnaðinum av starvsfólkunum.

**Viðmerkingar:**

**Viðvíkjandi starvsfólki (Skjal I):**

**1.** Tørvur er framvegis á víðkan av sosialráðgevaratænastuni, og tí verður skotið upp, at seta sosialráðgevara at starvast á Almannastovuni og greisini at røkja arbeiði í Norðstreym og Vágum.

**2.** Tann roknskaparkøni yvirassistenturin skuldi upprunaliga av røttum tikið sær av nógvum øðrum enn lønum, roknskapum v.m. viðvíkjandi andveikraverndini. Tað hevur vist seg, síðan andveikraverndin varð yvirtikin 1. januar 1980, at bert hetta arbeiðið er so nógv, at tað er meira, enn eitt fólk kann útinna í vanligari arbeiðstíð.

Fyri at sleppa undan úrtíðararbeiði og fyri at nøkta tørvin á roknskaparligum kanningum v.m., herundir eisini av fíggjarætlanum fyri stovnar undir Almannastovuni, fíggjarætlan fyri raksturin av Almannastovuni og fíggjarætlanum fyri ríkis- og landskassa fyri almannaveitingar sum heild, er tað treytaleyst neyðugt at seta ein assistent sum hjálparfólk hja tí roknskaparkøna yvirassistentinum.

**3.** Telefonuppringingar, serliga frá viðskiftafólki, vaksa munandi í tali. Hetta er sera tarnandi fyri arbeiðið hjá tí útbúna starvsfólkinum. Skotið verður tí upp at seta eir skrivstovuassistent at taka sær av telefonansing burturav.

**4.** Arbeiðið á Almannastovuni økist so við og við og fyri at nøkta tann tørv á starvsfólki, sum stendst av hesum, verður skotið upp at seta ein næring.

Samlaða lønarútreiðslan kann setast upp soleiðis:

| | |
|---|---|
| Verandi (játtaða) starvsfólkið | 4.252.106 kr. |
| Sosialráðgevari | 127.764 — |
| 1 Assistent | 116.964 — |
| Skrivstovuassistentur | 109.764 — |
| Næmingur | 35.089 — |
| **Tilsamans** | **4.641.683 kr.** |

Lønirnar eru útroknaðar eftir galdandi lønum 1. juli 1983 + 4 prístalsviðbøtur.

**5. ad. 103151 Løn/avloysarar**
Metingin er gjørd í mun til roknaða tørvin á avloysarum í frítíð, undir sjúku og barnsferðarloyvi. Fyri árini frammanundan hava vit ikki roknað avloysarar vegna barnsferðarloyvi uppí,men søkt tað, tá tørvur er uppkomin (starvsfólk verið við barn). Nú hava vit fingið boð, um at vit ikki fáa hetta slag av avloysaraløunum uttan so, at tær eisini eru tiknir við á fíggjarlógini. Roknað er við 2 barnsburðum.

**Onnur konti:**

**ad. 103222 Løn/reingerð**
Útreiðslan er mett í mun til øktu hølini, sí annars ad. 213806 leiguútreiðslur.

**ad. 103405 Løn, Úrtíðarløn**
Urtíðararbeiðið á Almannastovuni fer bert fram hendingaferð og í lítlan mun, tá burtursæð verður frá teimum hálvárligu umrokningunum av pensiónum v.m. og vegna lógarbroytingar. Talið á uppskotinum er mett samsvarandi tørvinum.

**ad. 113202 og 113243 Ferða- og dagpeningur**
Tørvur er fyri tænastuferðum innanlands til eftirlit, skeið, fundir, tingingar v.m. Einki er søkt til uttanlandsferðir, tá roknað verður við, at søkjast skal í hvørjum føri sær um, at útreiðslur til uttanlandsferðir verða goldnar yvir serliga ferðakonto hjá landsstýrinum.

**ad. 123111 Skeið**
Tørvur er at latu starvsfólk fara á skeið í Føroyum, og at halda skeið fyri persónar við tilknýti til arbeiði viðvíkjandi almanna-veitingunum.

**ad. 213105 El, hiti og vask**
Útreiðslan er mett í mun til øktu hølini, sí annars ad. 213806 Leiguútreiðslur.

**ad. 213806 Leiguútreiðslur**
P/F Data hevur nú upplýst, at teir 1. december 1983 flyta úr sínum hølum á 3. hædd í sama bygningi, har Almannastovan og Matrikulstovan leiga hølir.

Vit hava tí gjørt av at søkja um at fáa økt hølir okkara frá sum nú er (336 $m^3$ + 134,4 $m^3$) ella 470,4 $m^3$ til 672 $m^3$.

Hetta ber í sær, at Landsstýrið leigar 2., 3., 4. og 5. hædd í bygningunum hjá P/F Dygd. Hetta hevur í allar mátar fyrimunir fyri klientviðgerðina, at fleiri einkult høli vera tøk til samtalur við klientar, so besir ikki framvegis eins og nú skulu standa fleiri í senn úti á avgreiðsluni og hoyra um persónlig viðurskifti hjá hvørjum øðrum, so sum sjúku, figgjarviðurskifti og onnur persónlig viðurskifti o.s.fr.

Almannastovan kann tá flyta út úr 4. hædd, sum so Matrikulstovan kann yvirtaka alla, meðan Almannastovan fær alla 2. hædd og 3. hædd. Henda loysn lættir eisini um atgongdina hjá teimum sjúku og gomlu. Haraftrat verður annars neyðugt til hetta endamál at leiga høli aðrastaðni, tá Landsskjalasavnið ikki longur fær móttikið í varðveitslu okkara gomlu skjøl, sum rokka u.l. 5-10 hyllametur um árið.

Roknað er við 2 hæddum (672 m²) tilsamans frá 1. apríl 1984.

Um játtan fæst, er høligtørvur okkara nøktaður ár fram í tíðina.

Metingin byggir eisini á upplýsingar frá P/F Dygd, sum sigur seg hava kravt eina hækking í leiguni frá 1. apríl úr 340,- kr. pr. m² pr. ár til 480,- kr. pr. m² pr. ár og príshækkan 4% pr. ár.

**ad. 213901 Ymiskar húsaútreiðslur**

Av hesi upphædd er høvuðsparturin mettur sum útreiðsla til neyðuga nýinnrættan av nýggjum hølum og til útskifting av gólvbelegningunum har teppi er nú á 2. hædd sum hevur við sær, at inniklimaðið er fullkomiliga óarbeiðsligt, sum nú er. Restin til vanligt viðlíkahald, sí annars ad. 213806 Leiguútreiðslur.

Upphæddin, sum er mett av kønum manni viðvíkjandi a. og b. kann býtast sundur soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| a. | Nýinnrættan á 3. hædd | 300.000 kr. |
| b. | Útskiftan av gólvbeleggningi á 2. hædd | 75.000 — |
| c. | Vanligt viðlíkahald | 25.000 — |
| ÷ d. | Goldið av P/F Dygd | ÷150.000 — |
| | Tilsamans | **250.000 kr.** |

**ad. 233051 Innbúgv**

Tørvur er á endurnýggingum, sum so við og við verða neyðugar, umframt arbeiðsamboð til nýtt fólk, sí anars ad. 213806 Leiguútreiðslur og skjal 1.

**ad. 233155 Prentlutir**
Stórur tørvur er á at prenta nýggj oyðibløð og endurprenta verandi oyðibløð, og er hetta gjørt eftir bestu meting.

**ad. 233259 Postgjald**
Metingin er gjørd út frá nýtsluni nú.

**ad. 233553 EDV-útreiðslur**
Uppskotið er grundað á meting av vanliga tørvinum viðvíkjandi dagliga rakstrinum, harundir gjald fyri EDV-koyring á P/F Data viðvíkjandi pensiónum, dagpeningi og lønum til starvsfólk hjá andveikraverndini.

Haraftrat kemur gjald fyri framhaldandi útbyggjan av systemi v.m. m.a. vegna kelduskatt av sosialu veitingunum og til leigu fyri on-line datatól.

Sum er umfata EDV-útreiðslurnar longu nú eisini dagpeningaútgjøld við 207.000,- kr. um árið fyri koyring av 52 vikuutgjøldum v.m., og er hetta høvuðsorsøkin til hækking av rakstrarútreiðslunum á hesi konto (koyring hvørja viku av útgjøldum, hvønn mánaða viðvíkjandi inngjøldum, hvønn ársfjórðing gjøld fyri læknaváttanir og hagtølum og lønarseðlum eina ferð um árið).

**ad. konto 103143 Løn/starvsfólk**
Verandi størv, 1 fulltrúi, 1 deildarleiðari, 2 yvirassistentar, 3,5 sosialráðgevarar, 1 assistentur 7/10 tíð, 14,6 assistentar og 1 næmingur.

Umsókn um nýggj størv: 1 sosialráðgevara, 1 assistentur, 1 skrivstovuassistentur og 1 næmingur.

Ad konto 103168 verandi størv: 1 stjóri, 1 løgfrøðingur.

---

**Viðmerking landsstýrisins:**

**Ad § 11 - 11359 Almannastovan**
Landsstýrið kann ikki taka undir við, at Almannastovan og Matrikulstovan leiga burtur av 3. hædd hjá Thomas Dam, sum P/F Data nú leigar. Av hesi orsøk eru konto 103222 Løn, reingerð, konto 213105 El, hiti og vask, konto 213806 Leigaútreiðslur, konto 213901 Ymiskar húsaútreiðslur og konto 233051 Innbúgv reguleraðar.

**Ad. konto 103143 Løn/starvsfólk**
Landsstýrið kann taka undir við, at 1 assistentur og 1 skrivstovuassistentur verða settir afturat á Almannastovuni, av tí at broytingin í forsorgarlógini hevur økt um arbeiðsbyrðuna hjá Almannastovuni. Men landsstýrið kann *ikki* taka undir við, at 1 sosialráðgevari verður settur aftrat nú, og heldur ikki at eitt næmingastarv verður sett afturat. Á almannastovuni er normering fyri 1 næmingi.

**Ad § 11 - 11409 Landsskúlafyrisitingin**
*Sbrt. skriv:*

| Konto | | Rokn-skapnr 1982 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan 1985/86 | Ætlan 1986/87 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | í 1.000 kr. | í 1.000 kr. |
| | | **1.000 kr.** | | | | | |
| 73605 | Endurgjald, ymist | ÷ 542 | ÷ 784 | ÷ 674 | ÷ 674 | ÷ 674 | ÷ 674 |
| 83809 | Leiguinntøkur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 103048 | Løn/tænastumenn | 1.655 | 2.092 | 2.423 | 2.423 | 2.423 | 2.423 |
| 103143 | Løn/starvsfólk | 1.064 | 1.347 | 1.572 | 1.572 | 1.572 | 1.572 |
| 103151 | Løn/avloysarar | 5 | 84 | 84 | 60 | 60 | 60 |
| 103168 | Løn/sáttmálaløn | 501 | 557 | 407 | 407 | 407 | 407 |
| 103222 | Løn/reingerð | 87 | 203 | 180 | 180 | 180 | 180 |
| 103405 | Útiðarløn | 0 | 32 | 32 | 22 | 22 | 22 |
| 103509 | Samsýningar | 9 | 200 | 225 | 225 | 225 | 225 |
| 113202 | Ferða- og dagpen. innanl. | 76 | 300 | 310 | 310 | 310 | 310 |
| 113243 | Ferða- og dagpen. uttanl. | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 113666 | Læraraskeið uttanl. ST/HF | 0 | 100 | 110 | 110 | 110 | 110 |
| 203308 | Lýsingar | 44 | 35 | 60 | 60 | 60 | 60 |
| 213105 | El, hiti og vask | 18 | 50 | 180 | 180 | 180 | 180 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 241 | 393 | 393 | 393 | 393 | 393 |
| 233051 | Innbúgv | 140 | 150 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 233155 | Prentlutir | 69 | 209 | 230 | 230 | 230 | 230 |

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 233259 | Postgjøld | | 50 | 50 | 60 | 60 | 60 | 60 |
| 233354 | Telefon og telex | | 101 | 95 | 175 | 175 | 175 | 175 |
| 233409 | Leiga av maskinum | | 33 | 100 | 200 | 170 | 170 | 170 |
| 233504 | Sakkøn hjálp | | 117 | 465 | 510 | 444 | 444 | 444 |
| 233529 | Prógtøkur v.m. | | 1.065 | 1.006 | 1.400 | 1.400 | 1.400 | 1.400 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | | 173 | 253 | 250 | 150 | 150 | 150 |
| 233616 | Prógtøkur - fólkaskúlin | | 364 | 0 | — | — | — | — |
| 233624 | Prógtøkur - sjómansskúlar | + | 188 | 0 | — | — | — | — |
| 233632 | Prógtøkur - student. og HF | ÷ | 513 | 0 | — | — | — | — |
| 353258 | Stuðul frá Búagrunninum | | 9 | 0 | — | — | — | — |
| | Samlað upphædd | | 5.448 | 7.721 | 8.901 | 8.671 | 8.671 | 8.671 |
| | Landskassans partur | | 4.906 | 6.937 | 8.227 | 7.977 | 7.997 | 7.997 |

**Almennar viðmerkingar:**
Sambært skriv landsstýrisins, dagfest 11. august 1983, j. nr. 400-36, viðvíkjandi fíggjarløgtingslóg fyri 1984/85, hevur Landsskúlafyrisiting gjørt hetta uppskot.

Av tí at tað ikki er endaliga ásett, hvussu mong mál, serliga undir § 14 á løgtingsfíggjarlógini, Landsskúlsfyrisitingin skal fyrisita í framtíðini, eru metingarnar hvat onkrari konto viðvíkur ikki so neyvar, sum ein kundi ynskt og er ikki lætt við vissu at siga, hvussu býtið av umsitingarútreiðslunum verður millum tær ymsu konti'irnar.

Nú Landsskúlafyrisitingin hevur 4 ár á baki, ber betur, enn frammanundan, til at meta um, hvussu Fyrisitingin kann gerast før fyri at røkja tær uppgávur, sum eru — og væntandi verða lagdar til stovnin. Í løtuni er manningin á stovninum uml. 23, og er hetta eitt heldur størri tal enn tað, ið nevnt var í landsstýrisins viðmerkingum, tá ið Fyrisitingin var yvirtikin. Men tað lága tal, ið tá var nevnt, man helst verða mett við støði í smáum royndum og óvissum upplýsingum.

Nú ber ið hvussu so er til at siga, at skal Landsskúlafyrisitingin røkja til fulnar tær uppgávur, sum natúrliga hoyra undir stovnin, má roknast við, at talið av fólki fer at vaksa nakað tey komandi árini soleiðis, at stovnurin, tá ið hann er liðugt útbygdur, m.a. er førur fyri at skapa nýhugsan og menning, samstundis sum neyvt eftirlit verður havt við, at skúlaverkið sum heild ikki kostar meira enn neyðugt er.

Í uppskotinum er roknað við teimum størvum, sum higartil eru góðkend, og harumframt verður søkt um tvey størv afturat, eitt skrivstovustarv og eitt starv sum námsfullrúi.

Landsskúlafyrisitingin væntar, at settir verða nakrir sergreinaráðgevarar fyri fólkaskúlan, men ilt er at siga, nær hesar setanir verða aktuellar.

Hesar setanir eru áður viðtiknar av Føroya Skúlastjórn og góðkendar av landsstýrinum. Men av tí at enn eingin semja er fingin við lærarafelagið um setanarkorini, er eingin starvsseta farin farin enn. Løn til slíkar sergreinarráðgevar verður væntandi konterað á fólkaskúlans læraralønir (§ 14-65014 - 293013).

Viðvíkjandi hinum konti eru í mest møguligan mun nýttar tær upplýsingar, sum kunnu metast við støði í rokuskapinum fyri Landsskúlafyrisitingina fyri tíðarskeiðið 1. apríl 1982 — 30. august 1983.

Í uppskotinum er somuleiðis roknað við útreiðslum til gerð av prøvtøkuuppgávum, prógvdøming v.m. til í fyrsta umfari fólkaskúlan, sjómansskúlarnar, studentaskúlarnar og HF-skeiðini og harafturat læraraskúlan og í ávísan mun eisini handilsskúlan og teknisku skúlarnar.

Nevndu viðurskifti geva eitt rímiligt støði fyri metingina av teimum samlaðu útreiðslunum, men býtið fyri Landsskúlafyrisitingina millum tær einstøku konti man hin vegin vera ivasamt. Tað ber neyvan til at gera eina hóskandi sundurbýting, fyrr enn Landsskúlafyrisitingin hevur enn nøkur ár á baki.

Mælt verður til, at Landsskúlafyrisitingin fær heimild til innan ta samlaðu játtan at flyta av eini konto á aðra, tó soleiðis, at tað skipaða talið á størvum ikki verður hækkað út um tað ásetta markið, uttan at málið verður lagt fyri landsstýrið.

Samlaðu útreiðslurnar eru eftir uppskotinum mettar til 8,9 mió. kr. Av hesi upphædd verða uml. 0,7 mió. kr. goldnar av § 14 - 65014 - 293013 - læraralønir í fólkaskúlanum og av hesum uml. 0,7 mió. kr. endurrindar ríkiskassin landskassanum 100%.

Sostatt verða nettoútreiðslur landskassans til Landsskúlafyrisitingina í fíggjarárinum 1983/84 uml. 8,2 mió. kr. Raksturin av Landsskúlafyrisitingini er við øðrum orðum dýrkaður við uml. 17% frá fíggjarárinum 1983/84 til fíggjarárið 1984/85; av nevndu øking er bert ein minni partur prísvøkstur.

**Viðmerkingar til tær einstøkukonti.**

**Ad. 73605 Endurgjald, ymiskt**
Henda konto fevnir um endurgjald av lønum til teir tænastumenn á Landsskúlafyrisitingini, ið verða løntir smbært lóg nr. 65, dagfest 8. mars 1979 um tænastumenn v.fl. í føroyska fólkaskúlanum. Lønin til hesar tænastumenn verður goldin beinleiðis av konto fyri læraralønir í fólkaskúlanum. Av hesum lønum skal landskassin gjalda 45%. Tann upphædd, sum finst á hesi konto sum endurgjald, eru tey 55%, sum ríkiskassin eigur at gjalda.

| | | |
|---|---|---|
| R.: | 82/83 | 542 |
| J.: | 83/84 | 784 |
| U.: | 84/85 | 674 |

**Ad. 103048 Løn, tænastumenn**
Henda konto fevnir um løn til tey fólk, sum eru lønt eftir tænastumannalógini, íroknað 5, sum ikki eru tænastumenn.

| | |
|---|---|
| 1 landsskúlastjóri | (ikki enn tænastumaður, men farloyvi frá tænastumannastarvi sum landsskúlaráðgevari). |

| | | |
|---|---|---|
| 1 | deildarleiðari | (tænastumaður løntur eftir læraralønarlógini). |
| 1 | skúlapsykologur | (tænastumaður løntur eftir læraralønarlógini). |
| 1 | sjónráðgevari | (tænastumaður løntur eftir læraralønarlógini). |
| 1 | tali-/hoyriráðgevi | (tænastumaður løntur eftir læraralønarlógini). |
| 1 | lesipedagogur | (tænastumaður løntur eftir læraralønarlógini). |
| 2 | nánisfulltrúar við fólkaskúlan | (tænastumenn eftir læraralønarlógini). |
| 1 | deildarleiðari | (løntur eftir tænastumannalógini) |
| 2 | námsfulltrúar við vinnuskúlarnar | (løntir eftir tænastumannalógini). |
| 1 | nýggj normering sum námsfulltrúi, sí viðmerkingar Landsskúlastjórans í hesum uppskoti. | |

Lønin til teir 7 tænastumenn, sett/ir eftir læraralønarlógini, verður at deila millum ríkis- og landskassan við 45% til landskassan sbr. lóg nr. 65, dagfest 8. mars 1972 § 45, 2. stk.

Tað er at viðmerkja, at tað í vissan mun kann áleggjast sjón-, lesi- og tali-/hoyriráðgevarunum at undirvísa í fólkaskúlanum. Hetta má haldast at veraneyðugt fyri arbeiði teirra á hesum trimum umráðunum.

Um so er, at undirvísingin fer fram á einum øðrum undirvísingarstovni enn fólkaskúlanum, eigur viðkomandi undirvísingarstovnur at endurgjalda, meðan hetta er óneyðugt, um so er, at undirvísingin fer fram í fólkaskúlanum, av tí at vikomandi, sbr. omanfyri, verða løntir eftir læraralønarlógini.

Ímun til játtanina á løgtingsfíggjarlógini fyri 1983/84 er henda konto vaksin við 16% ella 331.000 kr. Hesin vokstur er m.a. grundaður av, at í hesi konto er eitt fólk sett, sum var á konto 102168, sum er lækkað samsvarandi.

Samlaðu lønarútreiðslurnar á hesari konto verða kr. 2.432.000. Av hesum verða kr. 1.225.000 goldnar av konto fyri læraralønir í fólkaskúlanum. Av hesum, kr. 1.225.000, skal landskassin gjalda 45%. Landskassans partur av hesi konto verður sostatt

kr. (2.423.000 + (1.225.000 × 0,55)) = 1.749.000 kr.

| | | |
|---|---|---|
| R.: | 82/83 | 1.655.000 |
| J.: | 83/84 | 2.092.000 |
| U.: | 84/85 | 2.423.000 |

Harav landskassans partur kr. 1.749.000.

**Ad. 103143 Løn, starvsfólk**
Starvsfólkini, sum verða løgt av hesi konto, eru:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | skrivstovufólk í | 18. lønarflokki | |
| 1 | skrivstovufólk í | 12. lønarflokki | |
| 11 | skrivstovufólk í | 9. lønarflokki | (harav 3 arbeiða deiltíð) |
| 1 | skrivstovufólk í | 7. lønarflokki | (Hetta er eitt avloysari, sum situr í ½ starvi fyri lærling, sum ikki er settur og ½ starv, sum er tøkt vegna deiltíðararbeiði hjá nøkrum fólkum). |

Søkt verður um, at skipað verður eitt starv afturat, og verður roknað við, at hetta fólk verður løgt í 9. lønarflokki í starvsmannasáttmálanum. Men samstundis er eisini roknað við, at eitt av omanfyri nevndu starvunum í 9. lønarflokki fer at verða løgt í 12. lønarflokki.

Starvið, ið søkt verður um av nýggjum, er orsakað av, at stovnurin, sum kunnugt, er undir útbygging, ið fer fram eftir ætlan. Samstundis sum nýggi máli økir koma afturat, verða stoðugt fleiri og fleiri uppgávur lagdar til stovnin, og skrivstovuarbeiðið á stovninum økist tí sjálvsagt samsvarandi. Sí viðmerking Landsskúlastjórans aftast í hesum uppskoti.

Tað er vert at leggja dent á, at Landsskúlafyrisitingin neyvan kann hjálpast við minni enn hesum eina starvi afturat.

| | | |
|---|---|---|
| R.: | 82/83 | 1.064 |
| J.: | 83/84 | 1.347 |
| U.: | 84/85 | 1.572 |

Vøksturin á hesi konto er uml. 17%. Hesin vøkstur stendst av lønarvøkstri og nýnormeringum.

**Ad. 103151 Løn, avloysarar**
Her verður søkt um somu upphædd sum á uppskoti fyri fíggjarárið 1983/84.

| | | |
|---|---|---|
| R.: | 82/83 | 5 |
| J.: | 83/84 | 84 |
| U.: | 84/85 | 84 |

**Ad. 103168 Løn, sáttmálaløn**
Henda konto fevnir um lønir til 2 fulltrúar, sum eru løntir eftir verkfrøðingasáttmálanum.

Í mun til fíggjarárið 1983/84 er roknað við eini minking uppá 27%. Hetta kemst av, at uppskotið fyri 84/85 fevnir um 2 fólk móti 3 fyri 82/83.

| | | |
|---|---|---|
| R: | 82/83 | 501 |
| J: | 83/84 | 557 |
| U: | 84/85 | 407 |

**Ad. 103222 Løn, reingerð**

| | | |
|---|---|---|
| R: | 82/83 | 87 |
| J: | 83/84 | 203 |
| U: | 84/85 | 180 |

**Ad. 103509 Samsýningar**
Av hesi konto verður at gjalda fundarpeningur til limirnar í Landsskúlaráðnum.

Somuleiðis verður av hesi konto rindaður fundarpeningur til fastar nevndir, heruppií slíkar nevndir, sum landsskúlastjórin hevur sett sambært § 6 í lógini um skúlafyrisiting, sum so er, at fimaskapur í viðkomandi nevnd gevur rætt til fundarpening.

Henda konto kann somuleiðis nýtast til at veita smærri samsýningar til limir í serligum arbeiðsbólkum, ið settir eru, og sum ikki eru at meta sum fastar nevndir. Samsýningin kann vanliga ikki vera størri enn tann vanligi fundarpeningurin.

Starvsfólkið á Landsskúlafyrisitingini og á landsskrivstovuni hevur vanliga ikki rætt til at fáa fundarpening, av tí at nevndararbeiði v.m. innan Landsskúlafyrisitingina vanliga er ein partur av arbeiði teirra.

| | | |
|---|---|---|
| R: | 82/83 | 9 |
| J: | 83/84 | 200 |
| U: | 84/85 | 225 |

**Ad. 113202 Ferða- og dagpeningur**
Henda konto fevnir um játtan til tænastuferðir bæði innanoyggja og tænastuferðir uttanlands.

Henda konto skal somuleiðis bera ferðaúteiðslurnar hjá limunum í Landsskúlaráðnum, limum í føstum nevndum v.m.

Sambært skriv hiðani til Føroya Landsstýri, dagfest 17. januar 1982, verður roknað við, at stovnurin fer at nýta umk. 35 uttanlandsferðir í 84/85, tá er íroknað, at tað møguligt verður neyðugt at senda fólk, sum ikki eru knýtt at stovninum, ørindi av landinum. Eisini kann gerast neyðugt at senda onkra nevnd tænastuferð samb. §4, 1. stk. í Reglugerð nr. 3 fyri landsskúlastjóran, dagfest 2. januar 1980.

| | | |
|---|---|---|
| R: | 82/83 | 76 |
| J: | 83/84 | 300 |
| U: | 84/85 | 310 |

**Ad. 113243 Ferða- og dagpeningur uttanlands**
Øll játtanin til ferða- og dagpening verður søkt til konto 113202, men útreiðslurnar av ferðing uttanlands verða bókaðar á hesa konto.

**Ad. 113666 Læraraskeið uttanlands, Stud., HF.**
Henda konto, sum er nýggj, er gjørd, tí at lærarar, sum undirvísa við studentaskúlar og HF-skeið í Føroyum, sambært avtalu við Føroya Landsstýri, hava rætt til at fara uttanlands til eftirútbúgvingarskeið.

Roknað verður í mesta lagi við 27 ferðum, 2 til rektarar, 1 til inspektørar, 8 til lestravegleiðarar og 16 til lærarar.

| | | |
|---|---|---|
| R: | 82/83 | eingin konto |
| J: | 83/84 | 100 |
| U: | 84/85 | 110 |

**Ad. 203308 Lýsingar**
Av tí at lýsingamongdin í tráð við aktivitetsvøksturin á stovninum er nógv vaksin og konto'in harav ikki hevur kunnað goldið útreiðslurnar uttan yvirtrekk, verður henda konto

| | | |
|---|---|---|
| R: | 82/83 | 44 |
| J: | 83/84 | 35 |
| U: | 84/85 | 60 |

**Ad. 213105 El, hiti og vask**
Av tí at fyrisitingin fyrst í 83 flutti í nýggj og størri høli, er hendan konto vaksin nógv.

| | | |
|---|---|---|
| R: | 82/83 | 18 |
| J: | 83/84 | 50 |
| U: | 84/85 | 180 |

**Ad. 213806 Leigútreiðslur**
Fyrst í 1983 flutti stovnurin í nýggj høli.

Sambært sáttmála millum útleigaran og landsstýrið er húsaleigan kr. 460,76 m², roknað við prístali 1. januar 1982 sum støði, leigan verður at prístalsviðgera 1 ferð um árið.

Sambært leiðbeining viðvíkjandi uppskoti til logtingsfíggjarlóg frá landsstýrinum, skal roknast við dýrtíðarviðbótum frá prísligu 1. januar 1984.

Av tekniskum orsøkum verður m²-talið í nýggju hølunum ikki 680 m², sum sáttmálin sigur, men 732,9 m². Væntandi verða leigutreiðslurnar í 1984 ikki hægri enn januarin fyri 1983/84.

| | | |
|---|---|---|
| R: | 82/83 | 241 |
| J: | 83/84 | 393 |
| U: | 84/85 | 393 |

**Ad.233051 Innbúgv**
Av hesari konto verður ymisk størri skrivstovuútgerð, t.d. møblar, skrivi- og roknimaskinur, goldnar.

| | | |
|---|---|---|
| R: | 82/83 | 140 |
| J: | 83/84 | 150 |
| U: | 84/85 | 100 |

**Ad. 233155 Prentlutir**
Henda konto skal nýtast at rinda [illegible] ingar v.m. í landsskúlafyrisitingini, og [illegible] tøkuppgávurnar í [illegible]

Tað er ætlanin, at álit, árbøkur v.m. mega koma út í størri vavi, enn tey higartil eru komin. Tessvegna fer Landsskúlafyrisitingin at leggja størri dent á, at almenningurin í framtíðini skal hava høvi til at keypa hesi rit; sjálvt um tey kortini sum higartil verða send ókeypis til teir myndugleikar v.m., sum beinleiðis hava tilknýti til tey. Inntøkur av søluni verða at góðskriva hesi konto.

Umframt omanfyri nevndu rit skal henda konto somuleiðis bera útreiðslur til oyðubløð v.m., sum verða nýtt í umsitingini.

| | | |
|---|---|---|
| R: | 82/83 | 69 |
| J: | 83/84 | 209 |
| U: | 84/85 | 230 |

**Ad. 233259 Postgjøld**

Av tí at nøgdin av tí, sum verður sent sum postur, er nógv vaksandi, verður henda konto hækkað samsvarandi.

Eisini má havast í huga, at postgjaldið hækkar.

| | | |
|---|---|---|
| R: | 82/83 | 50 |
| J: | 83/84 | 50 |
| U: | 84/85 | 60 |

**Ad. 233354 Telefon og telex**

Við støði í teim mánaðarligu útreiðslunum til hetta endamál, verður henda konto hækkað 80.000 kr.

| | | |
|---|---|---|
| R: | 82/83 | 101 |
| J: | 83/84 | 95 |
| U: | 84/85 | 175 |

**Ad. 233409 Leiga av maskinum**

Henda konto fevnir um leiguútreiðslur til kopimaskinu, poststempulmaskinu o.a.

Stovnurin hevur nógva skriving, sum endurtekur seg bert við smáum broytingum, t.d. ársfrágreiðing fyri skúlaverkið, bæði á føroyskum og donskum. Til slík arbeiði vildi tað spart heilt nógva tíð, um stovnurin hevði eitt sokallað »textbehandlingsanlæg«.

So statt verður hervið sókt um lov til at leypt kervi slíkt anlæg

| | | |
|---|---|---|
| R: | 82/83 | 33 |
| J: | 83/84 | 100 |
| U: | 84/85 | 200 |

**Ad. 233504 Sakkøn hjálp**

Av hesi konto verða goldnar útreiðslur til sergreinarráðgevarar í tann mun, hetta ikki kann bókast á læraralønarkonto fólkaskúlans, til aðra ráðgevarahjálp og til tess at rinda ráðgevaraviljanir í tann mun, slíkar viljanir ikki verða goldnar á annan hátt.

Løn til serkøn fólk, ið heitt verður á at gera ávísar uppgávur fyri Landsskúlafyrisitingina, verður eisini goldin av hesi konto. Í hesum sambandi verður hugsað um t.d.: tá ið stovnurin hevur tørv fyri hjálp frá kliniskum psykologi. Konto'in er hækkað við uml. 10% í mun til F.L.I. 1983/84.

| | | |
|---|---|---|
| R: | 82/83 | 117 |
| J: | 83/84 | 465 |
| U: | 84/85 | 510 |

**Ad. 233529 Prógtøkur v.m.**

Umframt teir skúlar, sum higartil hava gjørt nýtslu av hesari konto, verða væntandi nakað meira av prógtøkunum á handilsskúlanum og tað, sum teknisku skúlarnir hava av vanligari prógtøku, at gjalda av hesi konto.

| | | |
|---|---|---|
| R: | 82/83 | 1.065 |
| J: | 83/84 | 1.006 |
| U: | 84/85 | 1.400 |

Hækkanin á hesi konto er gjørd sambært meting við støði í teirri útreiðslum, sum higartil (01.08.83) hava verið á hesi konto.

**Skjal I**

**Viðmerkingar landsskúlastjórans:**
Vísandi til átekning landsstýrisins, dagfest 13. juni 1983, í hjálagda skrivi frá Føroya Sjómansskúla, dagfest 9. mai 1983, har skotið verður upp, at maður verður settur í skipað starv (helst í Landsskúlafyrisitingini) við tí virkisøki at hava fyrisitingina av sjómannaútbúgvingini um hendi, skal Landsskúlafyrisitingin gera hesar viðmerkingar til áðurnevnda skriv og uppskot.

Landsskúlafyrisitingin er samd í tí sjónarmiði sum heild, at sjómannaútbúgvingin er av sera stórum týdningi, at neyðugt er, at skipað verður so fyri, at sjómenn okkara fáa eina holla, praktiska upplæring, at »prógdómarin« ella prógtøkunevndin hevur gott innlit í skúlans viðurskifti og tey viðurskifti, ið hava við útbúgvingina av okkara sjófólki at gera, og at neyðugt er, at »prógdómarin« ella prógnevndin gera seg kunnug við allar broytingar, ið fara fram á hesum umráði, og gera seg kunnugan við reglur og fyriskipanir á altjóða øki.

Landsskúlafyrisitingin er eisini samd í tí sjónarmiði, at so væl má leggjast til rættis innan hesa útbúgving, at vit ikki gerast eftirbátar á hesum týdningarmikkla umráði. Men í hesum sambandi skal vera lagt aftrat, at í Landsskúlafyrisitingini verður mett, at hesi viðurskifti, ið omanfyri eru nevnd, stórt sæð eru galdandi innan allar útbúgvingar og serliga fyri fyrisitingarliðin innan øll skúlaumráði. Tað er neyðugt, at skipað verður so fyri, at ungdómur okkara fær eina holla upplæring á øllum umráðum, og tað er neyðugt, at tey, ið standa fyri stýringini og fyrisitingini av einihvørjari útbúgving, líkamikið hvør hon so er, hava hollan kunnleika til viðkomandi útbúgving.

Sum kunnugt, eru vit fáment her á landi, men skúlaskapur er skúlaskapur, annaðhvørt landið er lítið ella stórt. Í mongum føri er fyriskipanararbeiðið nærum tað sama í einum lítlum landi sum í einum størri.

Tað verður, ið hvussu er, ofta so, at tað fyrisitingarliga og framtaksskapandi arbeiðið, tá ið talan er um skúlaskap, verður lutfalsliga í mun til fólkatalið væl størri í einum landi við lítlum fólkatali enn í einum landi við nógvar ferðir meira fólki. Sum dømi í hesum sambandi kann nevnast: at gera vegleiðandi lesiætlanir; at gera prógtøkuuppgávur; at gera rundskriv av ymiskum slag; at gera uppskot til lógarbroytingar og reglugerðir; at halda seg kunnugan við gongdina í øðrum londum; at vera á fundum við myndugleikunum; at gera formularar at nýta hjá skúlum, lærarum o.ø., at gera frágreiðingar, lýsingar o.l. Frumarbeiðið verður tað sama, annaðhvørt næmingarnir í skúlunum eru

10.000 ella 500.000 (í fólkaskúla), 200 ella 5.000 (í hægri skúla).

Samsvarandi hesum og samsvarandi tí sjónarmiði, sum eisini kemur fram í hjálagda skrivi frá Føroya Sjómansskúla, eigur at verða skjótt at kunna semjast um, at manningin í Landsskúlafyrisitingini er alt ov fámenn til at kunna røkja allar tær uppgávur út í æsir, sum ynskjandi kundi verið eftir.

Skal alt tað fyrisitingarliga, tað umsjónarliga, tað ráðgevandi og tað framtaksskapandi arbeiðið røkjast soleiðis, at øll avvarðandi kunnu verða best møguliga nøgd, at gott tænarhald verður á øllum tí figgjarliga, og soleiðis, at vit ikki av fyrisitingarligum orsøkum gerast eftirbátar, so gerst hetta neyvan við tí manning, sum er.

Samanberandi við tilsvarandi manningar í øðrum londum má manningin 23 fólk hjá okkum tykjast láturliga lítil. Skuldu vit farið at samanborið, máttu vit helst komið til eitt tal, ið varð nærri 100 enn 50, sjálvt um vit tóku hædd fyri, at vit bert eru 44.000 her á landi. Tá eru kortini møguligir sergreinaráðgevarar íroknaðir.

Men tá ið hetta er sagt, skal eisini beinanvegin verða sagt, at aftan á 4 ára royndir heldur Landsskúlafyrisitingin seg nú kunna meta, uttan at samanbera við onnur lond, at tað eigur at kunna bera til at skipa fyri skúlaskapinum her á landi við manning, sum er nógv færri enn 100 og helst eisini færri enn 50. Men skulu sjónarmiðini í hjálagda skrivi frá Føroya Sjómansskúla verða fylgd, sum Landsskúlafyrisitingin metir vera tey røttu, so verður neyðugt, at manningin verður nakað økt afturat teim 23, sum nú eru.

Í hesum sambandi skal viðmerkjast, at tá ið mangan verður sagt bæði í talu og skrift, at tann manning, sum hevur fyrisitingina av skúlaskapinum um hendi, er nógv økt, síðani vit fingu ta nýggju stýrisskipanina í 1979, so metir Landsskúlafyrisitingin, at hetta er langt av leið. Eftir meiningunum hjá Landsskúlafyrisitingini er manningin ikki økt, men heldur tvørturimóti. Taka vit samanum øll tey, sum arbeiddu við skúlafyrisitingini av tí føroyska skúlaskapinum undan 1979, so mundi talið heldur vera størri enn minni enn 23. Her verður hugsað um fólk á hesum stovnum, sum arbeiddu við skúla- og undirvísingarfyrisiting: landsskúlaráðgevarastovnin, ríkisumboðið, landsstýrið (3 mannaráðið og læruráðið íroknað), 4 direktoratir í Danmark og so ymisk onnur fólk, sum røktu scruppgávur, sum fyrr lógu hjá ymsum skúlum, men nú verða gjørdar í Landsskúlafyrisitingini.

Nakað heilt annað er, at manningin átti at verið nakað meira økt, tí so vítt ein skilti tað, ið lá aftan fyri yvirtøkuna av stýringini av undirvísingarverkinum, so var tað ikki fyrst og fremst við tí fyri eyga at spara

um fyrisitingarliðin. Hann ger kortini ógvuliga lítlan mun í øllum tí fíggjarliga samanhanginum.

Heldur verður í Landsskúlafyrisitingini mett, at ætlanin var m.a. at fáa eina meira effektiva fíggjarliga stýring við góðum tamarhaldi, at fáa eina samskipaða planlegging til tess at sleppa undan yvirlappingum og at fáa ein fyrisitingarlið til tess at skipa fyri einum skúlaskapi, hóskandi føroyskum viðurskiftum og føroyskum ungdómi.

Hesum viðvíkjandi er nakað komið álciðis ta stuttu tíð, Landsskúlafyrisitingin hevur virkað, men í mongum førum hevur mátturin hjá Landsskúlafyrisitingini kenst ov lítil, tí ov lítil manning var. Spell verður, um so verður, at sjónarmiðið, tað at spara upp á skillingin og lata dálan rúka, fer at verða atvold til, at eitt tiltak, sum kundi farið at roynst væl, fer at bukka undir orsakað av maktarloysi. Havast má í huga, at vøkstur og menning tíbetur er í samfelag okkara, og eisini í skúlaskapinum, og hetta saman við eini meira effektivari stýring má gera, at tað verður neyðugt við nakað større manning í fyrisitingarliðinum og ikki tvørturímóti.

Til endan skal í hesum sambandi viðmerkjast, at, tá ið samskipannarálitið varð gjørt í 1975, varð talað um eina manning í fyrisitingini við 27-29 fólkum smb. »Álit december 1975 viðvíkjandi samskipan av skúlaskapinum« síðurnar 26 og 78. Tá varð samanborið við Grønland, men her skal eisini viðmerkjast, at Landsskúlafyrisitingin er kunnug við, at í Grønlandi er manningin í skúlafyrisitingini nógv økt upp um tey umleið 28 síðani 1975.

**Niðurstøða:**

Við ávísing til omanfyristandandi og samanumtikið skal Landsskúlafyrisitingin leggja dent á, at skal Landsskúlafyrisitingin hava arbeiðsmegi til at skipa so fyri, at skúlaskapurin verður best møguliga hóskandi fyri landið fíggjarliga, undirvísingarliga, samfelagsliga og fyri tann einstaka, so verður neyðugt við nakað meira arbeiðsmegi, tó ikki so ógvuliga nógv aftrat.

Í Landsskúlafyrisitingini verður mett, at við eini manning upp á u.l. 30 fólk eigur at fara at bera til at hava eina gagnliga og góða fyrisiting av undirvísingarverkinum í Føroyum. Men her skal tó viðmerkjast, at her er ikki íroknað fakráðgevarar, sum so við og við fer at verða neyðugt at seta - við 1 til 2 dagar ráðgevaraarbeiði um vikuna - í teimum einstøku lærugreinunum.

Eisini skal viðmerkjast, at, tá ið manningin 30 verður nevnd omanfyri, so er tað ein *umleið ætlan*, og ætlanin er ikki at søkja um 7 fólk

aftrat ísenn. Hetta er meira sett sum ein manning at niðða ímóti. Tað, ið hugsað verður um aftrat, eru einir 4 sonevndir *saksbehandlarar* og eini 3 skrivstovufólk.

Men í fyrstu syftu skal Landsskúlafyrisitingin mæla til, at á komandi fíggjarlóg verður normerað aftrat til Landsskúlafyrisitingina: **1 námsfulltrúi og 1 skrivstovufólk.**

Hesin nýggi námsfulltrúin kundi so hóskandi sum høvuðsvirkisøki havt sjómansútbúgvingina um hendi. Hann kundi so hervið eisini komið at havt prógvtøkuna á sjómansskúlunum um hendi, og hetta hevði ført við sær, at útreiðslurnar til henda nýggja námsfulltrúan høvdu gjørst nakað minni enn annars, leysliga mett einar 30.000 kr. minni árliga, tí fyriskipanarvirksemi av prógvtøkuni hevur higartil mest verið gjørt fyri løn av fólki uttan fyri Landsskúlafyrisitingina.

Til endans skal viðmerkjast, at sum kunnugt eru í løtuni tvey av teim áður normeraðu størvunum, eitt deildarleiðarastarv og eitt námsfulltrúastarv leys at seta. Um nú so skuldi verið, at annað av hesum størvunum verður sett við fólki við serkunnleika til sjómansútbúgvingar, so fellur uppskotið um ein nýggjan námsfulltrúa tó *ikki* harvið burtur, tí við setan av serkønum fólki innan sjóvinnuútbúgving í eitt av teimum verandi størvunum, verður tilsvarandi meira tørvur á onkrum øðrum umráði, um so verður, at einki nýnormerað starv kemur aftrat á komandi fíggjarjáttan.

**Til Landsskúlafyrisitingina** **SKJAL: II**
**S: I**

*Soljóðandi skriv er sent Føroya Landsstýri*

**Til Føroya Landsstýri, Tinganes**

Tá ið nú Jógvan á Dul fer frá sum prógfómari á Føroya- og Klaksvíkar Sjómansskúla, hevur lærararáðið á Føroya Sjómansskúla á fundi tann 5. mai í ár einmælt samtykt at gera niðanfyri nevndu viðmerkingar hesum viðvíkjandi og seta fram uppskot um, hvussu okkara sjómannaútbúgving má leggjast til rættis í framtíðini, fyri at vit ikki skulu gerast eftirbátar á hesum tydningarmikla øki.

Fyri at ein prógdómari kann gera sítt arbeiði til lítar, er neyðugt, at hann hevur gott innlit í skúlans viðurskifti og tey viðurskifti, ið hava við útbúgvingina av okkara sjófólki at gera. Eisini má hann alla tíðina halda seg kunnugan við allar broytingar, ið fara fram á hesum øki. Har afturat eigur hann at gera seg kunnugan við reglur og fyriskipanir á altjóða øki (I.M.O.) og hjálpa til at hesar reglur verða settar í gildi í Føroyum.

Afturat hesum omman fyri nevnda eigur at verða skipað so fyri, at okk ara sjómenn fáa eina holla praktiska upplæring, t.d. við stovnsetan av sjóvinnuskúla.

Av tí at hetta arbeiði er so umfatandi, verður neyðugt, at ein maður verður settur í skipað starv á røttum øki. (Her er Landsskúlafyrisitingin helst rætta plássið).

Lærararáðið hevur samtykt at heita á Landsstýrið um beinan vegin at skipa fyri hesum, so vit ikki liggja sjóvarfallið av okkum.

Á Føroya Sjómansskúla tann 9. mai 1983

Fyri lærararáð Føroya Skjómansskúla:

*Hilmar Kaas,* frm. *Frans Jacobsen,* skr.

---

**Viðmerking landsstýrisins:**
Landsstýrið kann taka undir við, at 1 námsfulltrúi verður settur afturat á Landsskúlafyrisitingini at hava fyrisitingina av sjómansútbúgvingini um hendi, og at ein skrivstovuassistentur verður settur.

**Ad § 11-11452 Føroya Gjaldstova**

*Sbrt. skriv dagf. 13. oktober 1983:*

Visandi til hjálagda uppskot til fíggjarløgtingslóg 1984/85 viðvíkjandi Føroya Gjaldstovu, Tórshavn, skal við hesum verða gjørdar fylgjandi viðmerkingar:

*103048 Løn - tænastumenn*
Roknað er við galdandi normeringum, lønunum tann 1. juli 1983 + 4 dýrtíðarviðbøtur og 1½ % frítíðarsamsýning.

*103143 Løn - starvsfólk*
Roknað er við galdandi normeringum, lønunum tann 1. juli 1983 + aldursviðbøtur og 4 dýrtíðarviðbøtur og 1½ % frítíðarsamsýning.

Umframt tey 59 normeraðu størvini, er eisini roknað við 2 fólkum sum eykahjálp til skattainnkrevjing.

*103151 Løn - avloysarar*
Her er roknað við 9 avloysarum í ár. lf. 1. ari, nevniliga:
Skattadeildin 4 avloysarar í 4 mðr.
Tolldeildin 4 avloysarar í 4 mðr.
Høvuðsbókhaldið 1 avloysara í 4 mðr
og avloysara í 7 mðr. vegna barnsferð.

*103222 Løn - reingerð*
Gjaldstovan hevur fingið eina posttolldeild í gl. húsunum hjá Útvarpinum á Bryggjubakka, og lønirnar til reingerð eru mettar soleiðis:

| | |
|---|---|
| Skattadeildin og Geilin | 183.226,00 kr. |
| Bryggjubakki | 12.000,00 kr. |
| Høvuðsreingerð | 15.000,00 kr. |
| Frítíðaravloysarar | 15.500,00 kr. |
| Dýrtíðarhækking | 5.000,00 kr. |
| | 230.726,00 kr. |

*103288* *Løn - onnur*

Her er roknað við:

| | |
|---|---|
| 1 býboði | 72.000,00 kr. |
| Praktikantar | 6.000,00 kr. |
| Vitnigjøld | 40.000,00 kr. |

*103405* *Úrtíðarlønir*

Tað er ilt at siga, hvussu úrtíðararbeiðið fer at taka seg upp í 1984/85, men í

| | |
|---|---|
| 1982/83 vóru úrtíðarløsnirnar | 480.300,00 kr. |
| og í 1983/84 frá 1.4. - 30.9. | 492.000,00 kr. |

clla ein meirnýtsla upp á 57.000 kr. í mun til alla játtanina í 1983/84.

Tað er serliga á skattadeildini og á tolldeildini, at úrtíðararbeiði fer fram, og tað má sigast, at í ár hevur úrtíðararbeiðið verið ovurhonds nógv á skattadeildini. Á høvuðsbókhaldinum er úrtíðararbeiði at kalla hildið uppat, nú umleggingin til on-line fer at verða liðug. Undir vanligum umstøðum kann úrtíðararbeiði bert fyrikoma í sambandi við serligar edv-uppgávur, og tá ið talan er um at broyta landskassaløsnirnar.

Úrtíðarløsnirnar verða mettar soleiðis:

| | |
|---|---|
| Skattadeildin | 350.000,00 kr. |
| Tolldeildin | 125.000,00 kr. |
| Høvuðsbókhaldið | 60.000,00 kr. |

*113202* *Ferða- og dagpeningur, innanlands*

Hækkingin í mun til játtanina 1983/84 er orsakað av tí økta pantifútaarbeiðinum við innkrevjing av skatti.

*213105* *El, hiti og vask*

Í tíðini frá 1. apríl til 30. september 1983 hava útreiðslurnar verið 123.667,10 kr., og út frá hesum verður uppskotið 250.000 kr.

*213806* *Leiguútreiðslur*

Roknað er við fylgjandi leiguútreiðslum:

| | |
|---|---|
| P/f Marr &Co. | 230.000,00 kr. |
| Tryggingarsambandið | 160.000,00 kr. |
| Arkivpláss í býnum | 40.000,00 kr. |

*233155 Prentlutir*

Í tíðini frá 1. apríl til 30. september 1983 hava útreiðslurnar verið 227.201,41 kr., og út frá hesum verður uppskotið 500.000 kr., hóast útreiðslurnar til prentlutir vóru 606.500 kr. í 1982/83.

*233354 Telefon og telex*

Sum kunnugt eru telefongjøldini farin upp, og hetta er orsøkin til hækking í mun til játtanina 1983/84.

*233553 EDV-útreiðslur*

Í november 1980 gjørdi gjaldstovan sáttmála við S. Thygesen konsulent, Hørsholm, sum átók sær at fara undir umfatandi umlegging av umsitingarøkjum til ON-LINE. Fyrst í 1981 gjørdi nýkomna landsstýrið av, at tað sáttmálabundna arbeiðið ikki kundi fremjast eftir tí arbeiðs- og tíðarætlan, ið løgd var, av tí at skattadeildin, t.v.s. skattainnkrevjingin, skuldi fáast inn á ON-LINE-systemið áðrenn nakað annað.

Alt hetta mikla umleggingararvirkseni, sum í trý ár hevur ført ovurhonds stórar arbeiðsbyrður við sær, fer nú at vera av, og støðan kann gerast upp soleiðis:

*Sáttmálabundið arbeiði*

1. Landskassans høvuðsbókhald, sum p.t. verður brúkt av
   Gjaldstovuni
   Landssjúkrahúsinum
   Landsverkfrøðinginum

er liðugt umlagt til ON-LINE við fylgjandi aktivitetum:
   høvuðsbókhald
   debitorbókhald
   kreditorbókhald
   alimentatión
   íløgugrunnurin
   veðhaldsskyldur landskassans
   tollkredittur
   ferðaforskot

Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús skulu ætlandi um stutta tíð inn á systemið á sama hátt sum Landssjúkrahúsið.

2. Umleggingin av motorakfarsskrásetingini til ON-LINE er farin fram á fylgjandi økjum:
   Gjaldstovan - vegskattur liðugt umlagt
   Landfútin og
   Politistøðin - skrásetingin liðugt umlagt (tó er okkurt at rætta.)
   Bilsýnið - sýn v.m. liðugt umlagt (tó tykjast trupulleikar at gera seg galdandi.)

3. Landskassalønir, fólkaskúlalæraralønir og sjúkrahúslønir, sum er triði partur av sáttmálanum, verður ikki útint av S. Thygesen av fylgjandi orsøkum:

   a. Ein komandi kelduskattaskipan skal hava edv-samband við útgjaldingini av almennum lønum, og nakað slíkt var ikki upp á tal, tá ið sáttmálin millum gjaldstovuna og S. Thygesen varð gjørdur.

   b. Við tað at skattadeildin skuldi inn á edv-systemið, sum keypt varð frá Norsk Data, fóru plásstrupulleikar meira og meira at gera vart við seg.
   Metingin viðvíkjandi plássi, sum varð gjørd fyrst í 1981, vísti seg sostatt ikki at halda.

Fyri at koma burtur úr vandamálum, nevniliga sáttmálabroti mótvegis S. Thygesen og kelduskattaskipan mótvegis almennum lønum v.m. hevur landsstýrið í juni mð. í ár undirskrivað sáttmála við P/f Data viðvíkjandi almennum lønum, og gjaldstovan hevur við eykajáttan frá fíggjarnevndini keypt EDV-tólini - NORD 100 system, sama slag sum tað, ið gjaldstovan hevur - frá S. Thygesen, og støðan er sostatt nú hendan:

a. P/f Data skal sambært sáttmála gera lønarsystem, ið kunnu samskipast við komandi kelduskattaskipan.

b. Gjaldstovan økir on-line systemið við tólum frá S. Thygesen, og skuldi tað inniborið tryggari on-line umsiting og øktan kapasitet.

c. Í staðin fyri S. Thygesen er nú P/f Data komið inn í myndina sum fastur edv-konsulentur hjá gjaldstovuni.

4. Skattadeildin, sum ikki var við í sáttmálanum, er eisini umløgd til on-line skipan, men umleggingin hevur volt nógvar trupulleikar, og framvegis eru ávís vandamál ikki loyst, men vónandi er alt fingið í rætt lag áðrenn árið (1983) er úti.

Soleiðis sum støðan er nú, verður fylgjandi uppskot gjørt til edv-útreiðslur í 1984/85:

| | |
|---|---|
| *P/f Data:* | |
| Føst konsulenthjálp til on-line systemið hjá Føroya Gjaldstovu | 260.000,00 kr. |
| Landskassalønir | 250.000,00 kr. |
| Læraralønir | 195.000,00 kr. |
| Fólkapensjón v.m. | 300.000,00 kr. |
| Part í umlegging av fólkapensjón v.m. til on-line | 50.000,00 kr. |
| On-line leiga, service v.m. | 50.000,00 kr. |
| *P/f Elektron* | |
| Skattaálíkning, broytingar v.m. | 600.000,00 kr. |
| *Leasing* | |
| Nordania Leasing | 1.080.000,00 kr. |
| Spar Leasing | 23.400,00 kr. |
| *Leiga* | |
| Ericsson | 53.000,00 kr. |
| *Service* | |
| Norsk Data ApS | 300.000,00 kr. |
| Farodane & Co. | 3.300,00 kr. |
| Annað óvæntað | 100.000,00 kr. |
| | 3.164.700,00 kr. |
| + endurgjald frá stovnum | 330.000,00 kr. |
| | 2.834.700,00 kr. |

*233561* *Aðrar skrivstovuútreiðslur*

Orsakað av øktum starvsfólkatali - nýggj posttolldeild er sett á stovn - og orsakað av dýrtíðini, verða útreiðslurnar mettar til 175.000 kr.

## FØROYA GJALDSTOVA 11452

Skjal 1

| Kontonummar og navn | | Rokn-skapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan í 1000 kr 1985/86 | Ætlan í 1000 kr 1986/87 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 73302 | Endurgj., Jarðarráðið | ÷ 4,0 | ÷ 4,0 | ÷ 4,0 | ÷ 4,0 | ÷ 4,0 | ÷ 4,0 |
| 73319 | - Menningargr. | ÷ 44,0 | ÷ 48,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| 73327 | - Íleggingargr. | ÷ 18,0 | ÷ 18,0 | ÷ 18,0 | ÷ 18,0 | ÷ 18,0 | ÷ 18,0 |
| 103048 | Løn - tænastumenn | 920,4 | 944,1 | 958,9 | 958,9 | 958,9 | 958,9 |
| 103143 | Løn - starvsfólk | 7.059,7 | 8.031,2 | 8.022,9 | 8.022,9 | 8.022,9 | 8.022,9 |
| 103151 | Løn - avloysarar | 314,3 | 383,7 | 459,0 | 459,0 | 459,0 | 459,0 |
| 103222 | Løn - reingerð | 173,0 | 174,0 | 230,7 | 230,7 | 230,7 | 230,7 |
| 103288 | Løn - onnur | 66,7 | 101,0 | 118,0 | 118,0 | 118,0 | 118,0 |
| 103405 | Úrtíðarlønir | 480,3 | 435,0 | 535,0 | 535,0 | 535,0 | 535,0 |
| 113202 | Ferða- og dagpen. innl. | 32,8 | 30,0 | 65,0 | 65,0 | 65,0 | 65,0 |
| 113243 | Ferða- og dagpen. uttanl. | 0,0 | 30,0 | 30,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| 203308 | Lýsingar | 16,0 | 15,0 | 20,0 | 20,0 | 20,0 | 20,0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 244,9 | 225,0 | 250,0 | 250,0 | 250,0 | 250,0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 404,0 | 380,0 | 430,0 | 430,0 | 430,0 | 430,0 |
| 213901 | Ymiskar húsaútreiðslur | 8,8 | 20,0 | 20,0 | 20,0 | 20,0 | 20,0 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 233051 | Innbúgv | 65,2 | 150,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 |
| 233155 | Prentlutir | 606,5 | 450,0 | 500,0 | 500,0 | 500,0 | 500,0 |
| 233259 | Postgjald | 1.377,0 | 1.500,0 | 1.500,0 | 1.500,0 | 1.500,0 | 1.500,0 |
| 233354 | Telefon og telex | 166,7 | 180,0 | 225,0 | 225,0 | 225,0 | 225,0 |
| 233409 | Leiga av maskinum | 30,5 | 60,0 | 60,0 | 60,0 | 60,0 | 60,0 |
| 233553 | EDV-útreiðslur | 2.997,6 | 1.850,0 | 2.834,7 | 4.734,7 | 4.734,7 | 4.734,7 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 231,5 | 150,0 | 175,0 | 175,0 | 175,0 | 175,0 |
| **Samanlagt** | | **15.129,9** | **15.039,0** | **16.512,2** | **18.382,2** | **18.382,2** | **18.382,2** |

*Ad konto 103048: Tænastumenn*: 1 stjóri, 1 roknskaparstjóri, 1 kassameistari, 2 fulltrúar.
*Ad konto 103143: Løn - tænastumenn*. 1 leiðari, 3 pantifútar, 6 yvirassistentar, 1 kassameistari, 43 assistentar og 5 næmingar.

**Viðmerkingar landsstýrisins**
Samtíðarskattaskipanin kemur í gildi 1. apríl 1984, og gongur verandi sáttmáli við P/f Elektron út tá, og nýggjur sáttmáli tekur við. Nýggi sáttmálin kemur at kosta uml. 2,5 mió. kr. í 1984/85.

Konto 233553, edv-útreiðslur, verða sostatt 4.734.700 kr.

---

Landsstýrið skilar sær rætt til at flyta normeringar millum Líkningarráð Føroya, Føroya Gjaldstovu og Mantalsstovuna í samband við umlegging til samtíðarskatt.

---

Ad konto 113243 Ferða- og dagpeningur uttanlands:

Landsstýrið hevur avgjørt, at hereftir verða útreiðslur til uttanlandsferðir hjá teimum smærru stovnunum bókaðar á rakstrarstað 11758. Um stovnurin hevur brúk fyri uttanlandsferðum, verður sum vanligt søkt um farloyvi, og útreiðslurnar verða bókaðar á rakstrarstað 11758 sundurgreinað soleiðis, at møguleiki er fyri at siggja, hvussu nógv hvør stovnur til eina og hvørja tíð hevur nýtt til uttanlandsferðir.

**Ad § 11 - 11466 Gjaldstovudeildin, Klaksvík**
*Sbrt. skriv dagf. 8. oktober 1983:*

| Kontonummar og navn | | Rokn-skapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan í 1000 kr 1985/86 | Ætlan í 1000 kr 1986/87 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103143 | Løn - starvsfólk | 533,8 | 555,0 | 571,5 | 571,5 | 571,5 | 571,5 |
| 103151 | Løn - avloysarar | 38,2 | 16,0 | 20,0 | 20,0 | 20,0 | 20,0 |
| 103222 | Løn - reingerð | 20,3 | 20,0 | 25,0 | 25,0 | 25,0 | 25,0 |
| 103405 | Løn - úrtíðarløn | 0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 14,3 | 12,0 | 15,0 | 15,0 | 15,0 | 15,0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 18,0 | 18,0 | 18,0 | 18,0 | 18,0 | 18,0 |
| 213901 | Ymiskar húsaútreiðslur | 0,9 | 5,0 | 5,0 | 5,0 | 5,0 | 5,0 |
| 233051 | Innbúgv | 7,7 | 10,0 | 10,0 | 10,0 | 10,0 | 10,0 |
| 233155 | Prentlutir | 2,6 | 5,0 | 5,0 | 5,0 | 5,0 | 5,0 |
| 233259 | Postgjald | 6,6 | 5,0 | 7,0 | 7,0 | 7,0 | 7,0 |
| 233354 | Telefon og telex | 7,0 | 10,0 | 10,0 | 10,0 | 10,0 | 10,0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 5,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 | 6,0 |
| **Samanlagt** | | **654,4** | **663,0** | **693,5** | **693,5** | **693,5** | **693,5** |

**Ad § 11 - 11471 Gjaldstovudeild í Saltangará**
*Sbrt. skriv dagf. 9. september 1983:*

Viðlagt verður sent uppskot til figgjarløgtingslóg 1984/85 og ætlanir fyri 1985/86 og 1986/87. Hækkingarnar eru einamest orsakað av dýrtíðini.

Viðvíkjandi innbúgvi søkja vit um at fáa játtað kr. 30.000,- til m.a. keyp av nýggjari fotokopimaskinu. Av tí at tann maskinan, ið vit hava, ikki riggar longur, halda vit tað vera best at keypa eina nýggja. Um vit skula leiga aðra maskinu, vil tann bíligasta kosta kr. 920,- um mánaðin, og vil tað tí vera bíligari at keypa. Um hildið verður best at leiga, má tann kontoin hækkast tilsvarandi.

Viðvíkjandi starvsfólkalønum, søkja vit um at fáa játtað á figgjarlógini til 1984/85 kr. 46.800,- til setan av næmingi. Síðan deildin opnaði í februar 1966, hevur starvsfólkatalið verið óbroytt 3. Tá arbeiðsuppgávan er nógv vaksin hesi ár, er neyðugt at eitt fólk verður sett afturat, fyri at kunna útinna eitt ábyrgdarfult arbeiði so gott, sum gjørligt. Tað fyrsta árið í 1966/67 høvdu vit 4.500 tollskjøl. Seinasta ár 1982/83 vóru 7.858 tollskjøl. Tann 31.8.82 høvdu vit 3.082 tollskjøl og tann 31.8.83 vóru 3.172 tollskjøl. Sum sæst er tollarbeiðið nógv vaksið og er støðugt vaksandi, afturat øðrum arbeiði t.d. mynstring.

Um vit fáa játtað kr. 46.800,- til setan av næmingi, verður ikki neyðugt við kr. 25.000,- til avloysaraløn og kr. 5.000,- til úrtíðarløn. Tað vil siga, at tað bert verður ein meirútreiðsla uppá kr. 16.800,-.

**Føroya Gjaldstova, rakstrarstað 11471**

**Saltangará**

*Skjal 1.*

| Kontonummar og navn | | Rokn-skapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan í 1000 kr 1985/86 | Ætlan í 1000 kr 1986/87 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103143 | Løn - starvsfólk | 382.190,46 | 413.000 | 478.500 | 478.500 | 478.5 | 478.5 |
| 103151 | Løn - avloysarar | 0,00 | 20.000 | 25.000 | 0 | 0.0 | 0.0 |
| 103222 | Løn - reingerð | 23.577,80 | 25.000 | 28.000 | 28.000 | 28.0 | 28.0 |
| 103405 | Úrtíðarlønir | 986,70 | 4.600 | 5.000 | 0 | 0.0 | 0.0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 10.155,74 | 10.000 | 12.000 | 12.000 | 12.0 | 12.0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 16.800,00 | 16.800 | 21.600 | 21.600 | 21.6 | 21.6 |
| 213901 | Ymiskar húsaútreiðslur | 0,00 | 1.500 | 2.000 | 2.000 | 2.0 | 2.0 |
| 233051 | Innbúgv | 4.308,50 | 5.000 | 30.000 | 30.000 | 6.0 | 6.0 |
| 233155 | Prentlutir | 8.544,65 | 9.000 | 10.000 | 10.000 | 10.0 | 10.0 |
| 233259 | Postgjald | 6.985,80 | 7.000 | 8.000 | 8.000 | 8.0 | 8.0 |
| 233354 | Telefon og telex | 9.167,95 | 10.000 | 15.000 | 15.000 | 15.0 | 15.0 |
| 233409 | Leiga av maskinum | 2.100,00 | 2.100 | 2.100 | 2.100 | 2.1 | 2.1 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 5.316,50 | 6.000 | 6.800 | 6.800 | 6.8 | 6.8 |
| **Samanlagt** | | **470.134,10** | **530.000** | **644.000** | **614.000** | **590.0** | **590.0** |

**Viðmerkingar frá Landsstýrinum:**

Konto 103143 Løn/starvsfólk, ein næmingur játtaður
Konto 103151 Løn/avloysarar 25.000 kr. ikki játtaðar
Konto 103405 Úrtíðarløn ir 5.000 kr. ikki játtaðar

**Ad § 11 - 11485 Gjaldstovudeild í Fuglafirði**

*Sbrt. skriv dagf. 8. oktober 1983:*

| Kontonummar og navn | | Rokn-skapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan í 1000 kr 1985/86 | Ætlan í 1000 kr 1986/87 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103143 | Løn/starvsfólk | 247.0 | 280.0 | 282.6 | 282.6 | 282.6 | 282.6 |
| 103151 | Løn/avloysarar | 62.9 | 23.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 |
| 103222 | Løn/reingerð | 16.2 | 19.0 | 19.0 | 19.0 | 19.0 | 19.0 |
| 103405 | Úrtíðarløn | 4.5 | 7.0 | 7.0 | 7.0 | 7.0 | 7.0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 10.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 |
| 213806 | Leiguútreiðsur | 14.5 | 18.0 | 18.0 | 18.0 | 18.0 | 18.0 |
| 213901 | Ymiskar húsaútreiðslur | 1.4 | 5.0 | 5.0 | 5.0 | 5.0 | 5.0 |
| 233051 | Innbúgv | 1.4 | 5.0 | 5.0 | 5.0 | 5.0 | 5.0 |
| 233051 | Innbúgv | 9.3 | 12.0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 |
| 233155 | Prentlutir | 3.2 | 9.0 | 5.0 | 5.0 | 5.0 | 5.0 |
| 233259 | Postgjald | 3.0 | 5.0 | 5.0 | 5.0 | 5.0 | 5.0 |
| 233354 | Telefon og telex | 5.5 | 9.0 | 9.0 | 9.0 | 9.0 | 9.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 7.8 | 11.0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 |
| | | **385.3** | **413.0** | **410.6** | **410.6** | **410.6** | **410.6** |

## Ad § 11 - 11466 Gjaldstovudeild á Tvøroyri

*Sbrt. skriv dagf. 7. okt. 1983:*

| Kontonummar og navn | | Rokn-skapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan í 1000 kr 1985/86 | Ætlan í 1000 kr 1986/87 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103143 | Starvsfólk | 401.4 | 419.0 | 434.3 | 434.3 | 434.3 | 434.3 |
| 103151 | Avloysarar | 0.2 | 20.0 | 30.0 | 30.0 | 30.0 | 30.0 |
| 103222 | Reingerðing | 14.5 | 15.0 | 18.0 | 18.0 | 18.0 | 18.0 |
| 213105 | El, hiti, vask | 14.2 | 5.0 | 12.0 | 12.0 | 12.0 | 12.0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 7.2 | 7.5 | 12.0 | 12.0 | 12.0 | 12.0 |
| 213901 | Ymiskar húsaútreiðslur | 1.0 | 3.0 | 8.5 | 8.5 | 8.5 | 8.5 |
| 233051 | Innbúgv | 2.1 | 3.5 | 8.5 | 8.5 | 8.5 | 8.5 |
| 233155 | Prentlutir | 3.5 | 3.5 | 5.5 | 5.5 | 5.5 | 5.5 |
| 233259 | Postgjald | 6,4 | 4.0 | 7.5 | 7.5 | 7.5 | 7.5 |
| 233354 | Telefon, telex | 2.3 | 4.0 | 6.0 | 6.0 | 6.0 | 6.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 3.8 | 4.0 | 6.0 | 6.0 | 6.0 | 6.0 |
| | | **456.6** | **488.0** | **548.3** | **548.3** | **548.3** | **548.3** |

**Ad § 11 - 11502 Gjaldstovudeild í Vági**

*Sbrt. skriv dagf. 8. oktober 1983:*

| Kontonummar og navn | | Rokn-skapur | Játtan | Uppskot stovnsins | Uppskot lands-stýrisins | Ætlan í 1000 kr | Ætlan í 1000 kr |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 1982/83 | 1983/84 | 1984/85 | 1984/85 | 1985/86 | 1986/87 |
| 103143 | Løn/starvsfólk | 277.9 | 284.7 | 298.3 | 298.3 | 298.3 | 298.3 |
| 103151 | Løn/avloysarar | 18.2 | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 103222 | Løn/reingerð | 22.7 | 26.4 | 26.4 | 26.4 | 26.4 | 26.4 |
| 103405 | Løn/úrtíðarløn | 0.0 | 1.0 | 1.0 | 1.0 | 1.0 | 1.0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 8.3 | 11.6 | 10.0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 17.0 | 18.0 | 18.0 | 18.0 | 18.0 | 18.0 |
| 233051 | Innbúgv | 5.1 | 5.0 | 12.0 | 12.0 | 12.0 | 12.0 |
| 233155 | Prentlutir | 2.4 | 5.5 | 5.5 | 5.5 | 5.5 | 5.5 |
| 233259 | Postgjald | 3.2 | 3.3 | 4.0 | 4.0 | 4.0 | 4.0 |
| 233354 | Telefon og telex | 3.9 | 5.0 | 5.6 | 5.6 | 5.6 | 5.6 |
| 233409 | Leiga av maskinum | 1.9 | 2.1 | 2.1 | 2.1 | 2.1 | 2.1 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 2.1 | 3.4 | 3.6 | 3.6 | 3.6 | 3.6 |
| | | **362.7** | **387.0** | **406.5** | **406.5** | **406.5** | **406.5** |

**Ad. § 11 - 11516 Gjaldstovudeild í Sørvági**

*Sbrt. skriv dagf. 29. sept. 1983:*

Hjálagt senda vit uppskot til fíggjarløgtingslóg *1984/85* og ætlan fyri 1985/86 og 1986/87, *viðvíkjandi rakstrarstaði 11516.*

| | | | |
|---|---|---|---|
| 103143 Løn/starvsfólk: | Løn pr. 1. juli 1983 ..... | kr. | 281.436 |
| | Aldursviðbøtur 2 × 1.800 ..... | — | 3.600 |
| | 4 prístalsviðbøtur 2 × 3.150 .... | — | 6.300 |
| | | **kr.** | **291.336** |
| 103151 Løn /avloysarar 2× 10.000 | | kr. | 20.000 |
| 213105 Leiguútreiðslur (føst avtala) | | kr. | 18.000 |

Allar aðrar konto eru hækkaðar við 10%.
Ætlanin fyri 1985/86 og 1986/87 er gjørd á sama hátt, sum uppskotið til 1984/85.

| Kontonummar og navn | | Rokn-skapur | Játtan | Uppskot stovnsins | Uppskot landsstýrisins | Ætlan í 1000 kr | Ætlan í 1000 kr |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 1982/83 | 1983/84 | 1984/85 | 1984/85 | 1985/86 | 1986/87 |
| 103143 | Løn/starvsfólk | 276.314 | 283.000 | 291.336 | 291.336 | 291.3 | 291.3 |
| 103151 | Løn/avloysarar | 0 | 20.000 | 20.000 | 20.000 | 20.0 | 20.0 |
| 103222 | Løn/reingerð | 10.442 | 10.500 | 11.550 | 11.550 | 11.6 | 11.6 |
| 103405 | Løn/úrtíðarløn | 0 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.0 | 1.0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 4.031 | 6.000 | 6.600 | 6.600 | 6.6 | 6.6 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 9.600 | 18.000 | 18.000 | 18.000 | 18.0 | 18.0 |
| 233051 | Innbúgv | 1.332 | 20.000 | 3.000 | 3.000 | 3.0 | 3.0 |
| 233155 | Prentlutir | 5.138 | 3.000 | 3.300 | 3.300 | 3.3 | 3.3 |
| 233259 | Postgjald | 2.478 | 4.000 | 4.400 | 4.400 | 4.4 | 4.4 |
| 233354 | Telefon og telex | 3.345 | 5.000 | 5.500 | 5.500 | 5.5 | 5.5 |
| 233561 | Aðrar útreiðslur | 2.664 | 4.500 | 5.000 | 5.000 | 5.0 | 5.0 |
| | | **315.344** | **375.000** | **369.686** | **369.686** | **369.7** | **369.7** |

## Ad. § 11 - 11554 Tolleftirlitið

*Sbrt. skriv dagf. 10. oktober 1983:*

Vísandi til skriv landsstýrisins er uppskot til fíggjarløgtingslóg 1984/85 viðvíkjandi rakstrarstaði nr. *11554: tolleftirlitið* verður uppskotið við hesum sent landsstýrinum við fylgjandi viðmerkingum:

**83912 Avgreiðslugjald og**
**103454 Útgj. av avgreiðslugjaldi**
Inntøkurnar og útreiðslurnar eru mettar út frá fyriliggjandi roknskapartølum í 1983/84, sum tann 1.10.83 eru ávikavist : 120.955,27 og 239.870,01. Men tað er ilt at meta um hesar inntøkur og útreiðslur, av tí at upphæddirnar í stóran mun eru ávirkaðar av, hvussu ferðaætlanin hjá feðraskipunum verður løgd.

**103048 Løn - tænastumenn**
Víst verður til hjálagda yvirlit.

**103151 Løn - avloysarar**
Roknað er við:
1 avloysara í 5 mðr. 11. lf. 1. ár
2 avloysarum í 4 mðr. (flogvøllurin) ditto
ella: 18 mðr. × 10.335,58 = 186.000,-
+ 9½% = 17.800,-

**233051 Innbúgv**
Roknað er við:

| | |
|---|---|
| 1 beriradio | 17.000,- |
| 2 r knimaskinur | 2.000,- |
| 2 skáp | 3.000,- |
| rest upp á bil | 25.000,- |
| annað | 5.000,- |

**233561 Aðrar skrivstovuútreiðslur**
Roknað er við:

| | |
|---|---|
| Endurútbúgving | 50.000,- |
| Bilútreiðslur | 15.000,- |
| Hundurin | 5.400,- |
| Annað | 45.000,- |

| Kontonummar og navn | | Rokn-skapur 1982/83 | Játtau 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan í 1000 kr 1985/86 | Ætlan í 1000 kr 1986/87 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 83912 | Avgreiðslugjøld | ÷ 347.4 | ÷ 300.0 | ÷ 170.0 | ÷ 170.0 | ÷ 170.0 | ÷ 170.0 |
| 103048 | Løn/tænastumenn | 1.986,7 | 2.153.0 | 2.338.3 | 2.338.3 | 2.338.3 | 2.338.3 |
| 103151 | Løn/avloysarar | 246.9 | 320.5 | 204.0 | 204.0 | 204.0 | 204.0 |
| 103222 | Løn/reingerð | 32.6 | 40.0 | 40.0 | 40.0 | 40.0 | 40.0 |
| 103454 | Útg. avgreiðslugjøld | 333.4 | 320.0 | 250.0 | 250.0 | 250.0 | 250.0 |
| 103509 | Samsýningar | 17.5 | 15.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 |
| 103907 | Eykagjald, tolleftirlit. | 65.0 | 70.0 | 70.0 | 70.0 | 70.0 | 70.0 |
| 113202 | Ferða- og dagpen. innanl. | 2.6 | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 113251 | Súkluendurgjald | 7.9 | 8.0 | 8.0 | 8.0 | 8.0 | 8.0 |
| 203308 | Lýsingar | 0.4 | 0.5 | 0.5 | 0.5 | 0.5 | 0.5 |
| 213105 | El, hiti og vask | 21.0 | 30.0 | 30.0 | 30.0 | 30.0 | 30.0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 34.4 | 40.0 | 40.0 | 40.0 | 40.0 | 40.0 |
| 233051 | Innbúgv | 86.1 | 135.0 | 55.0 | 55.0 | 55.0 | 55.0 |
| 233155 | Prentlutir | 0.4 | 3.0 | 3.0 | 3.0 | 3.0 | 3.0 |
| 233159 | Postgjald | 1.2 | 2.0 | 2.0 | 2.0 | 2.0 | 2.0 |
| 233354 | Telefon og telex | 28.0 | 35.0 | 35.0 | 35.0 | 35.0 | 35.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 39.7 | 45.0 | 115.0 | 115.0 | 115.0 | 115.0 |
| | | **2.556.4** | **2.937.0** | **3.055.8** | **3.055.8** | **3.055.8** | **3.055.8** |

**Ad § 11 - 11568 Trygdareftirlit á flogvøllinum**

*Sbrt. skr. dagf. 8. oktober 1983 frá gjaldstovuni:*

| Kontonummar og navn | | Rokn-skapur | Játtan | Uppskot stovnsins | Uppskot landsstýrisins | Ætlan í 1000 kr | Ætlan í 1000 kr |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 1982/83 | 1983/84 | 1984/85 | 1984/85 | 1985/86 | 1986/87 |
| 103151 | Løn | 89.3 | 400.0 | 188.8 | 188.8 | 188.8 | 188.8 |
| 103405 | Úrtíðarløn | 32.2 | — | 130.0 | 130.0 | 130.0 | 130.0 |
| 113202 | Ferða- og dagp. innanl. | 3.9 | — | 5.0 | 5.0 | 5.0 | 5.0 |
| 113243 | Ferða- og dagp. uttanl. | 10.0 | — | 60.0 | 0.0 | 0.0 | 0.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 5.2 | — | 5.0 | 5.0 | 5.0 | 5.0 |
| | | **140.6** | **400.0** | **388.8** | **328.8** | **328.8** | **328.8** |

*Viðvíkjandi 60.000 kr. til ferða- og dagpeningi uttanlands, er at siga, at roknast má við skeiðvirksemi o.tl. í Danmark.*

**Viðmerkingar landsstýrisins:**
Landsstýrið hevur avgjørt hereftir at bóka útreiðslur til uttanlandsferðir hjá teimum smærru stovnunum á rakstrarstað 11758. Um stovnurin hevur brúk fyri uttanlandsferðum, verður sum vanligt søkt um farloyvi, og útreiðslurnar verða bókaðar á rakstrarstað 11758 og ikki á stovnin. Tó verður rakstrarstað 11758 sundurgreinað soleiðis, at møguleiki er fyri at síggja, hvussu nógv hvør stovnur til cina og hvørja tið hevur nýtt til uttanlandsferðir.

## Ad. § 11 - 11604 Valuta- og Prísráð Føroya

*Sbrt. skriv dagf. 6. oktober 1983:*

Hjálagt uppskot til fíggjarløgtingslóg 1984/85.
Ætlan fyri 1985/86 og 1986/87 verður nøkunlunda tað sama.

Valuta- og Prísráð Føroya skal við hesum senda uppskot til fíggjarløgtingslóg 1984/85.

| Konto | | Roku-skapur | Játtan | Uppskot stovnsins | Uppskot landsstýrisins | Ætlan í 1000 kr | Ætlan í 1000 kr |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 1982/83 | 1983/84 | 1984/85 | 1984/85 | 1985/86 | 1986/87 |
| 103143 | Løn/starvsfólk | 413.618,88 | 559.1 | 572.0 | 572.0 | 572.0 | 572.0 |
| 103151 | Løn/avloysarar | 10.982,85 | 11.5 | 11.5 | 11.5 | 11.5 | 11.5 |
| 103222 | Løn/reingerð | 9.800,33 | 11.2 | 11.2 | 11.2 | 11.2 | 11.2 |
| 103509 | Samsýningar | 136.664,33 | 157.3 | 161.0 | 161.0 | 161.0 | 161.0 |
| 113202 | Ferða- og dagpen. innl. | 21.444,05 | 25.0 | 30.0 | 30.0 | 30.0 | 30.0 |
| 113243 | Ferða- og dagpen. útl. | 6.000,00 | 0.0 | 0.0 | 0.0 | 0.0 | 0.0 |
| 203308 | Lýsingar | 14.137,20 | 10.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 22.885,17 | 26.0 | 26.0 | 26.0 | 26.0 | 26.0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 16.500,00 | 30.3 | 16.5 | 16.5 | 16.5 | 16.5 |
| 233155 | Prentlutir | 0,00 | 7.0 | 7.0 | 7.0 | 7.0 | 7.0 |
| 233259 | Postgjald | 4.927,90 | 5.0 | 5.3 | 5.3 | 5.3 | 5.3 |
| 233354 | Telefon og telex | 3.716,65 | 9.6 | 10.5 | 10.5 | 10.5 | 10.5 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 22.206,27 | 35.0 | 30.0 | 30.0 | 30.0 | 30.0 |
| | | **676.889,63** | **887.0** | **906.0** | **906.0** | **906.0** | **906.0** |

| | | |
|---|---|---|
| 103143 | Roknað við løn 1. juli 1983 + 4×105,00 | |
| 103509 | Prísráðið, prísansarar og sýnsmenn | kr. 80.000,00 |
| | Prístalsnevndin + eykahjálp til EDV | kr. 81.000,00 |
| 103143 | Roknað við løn 1. juli 1983 + 4×105,00 | |
| 103509 | Prísráðið, prísansarar og sýnsmenn | kr. 80.000,00 |
| | Prístalsnevndin + eykahjálp til EDV | kr. 81.000,00 |
| 113202 | Prísráðið | kr. 12.000,00 |
| | Prístalsnevndin | kr. 18.000,00 |
| 213806 | Leiguútreiðslur og prísráðið, príseftirlitið og prísansari í Vági | |
| 233561 | Prístalsútrokning við EDV tólum uml. | kr. 12.000,00 |

*Sbrt. fíggjarætlan, móttikin 5. okt. 1983:* **Skjal 1.**

| Kontonummar og navn | | Rokn-skapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan í 1000 kr 1985/86 | Ætlan í 1000 kr 1986/87 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 73207 | Endurgjald kommunurnar | 0,00 | 0,00 | 0,00 | 0.0 | 0.0 | 0.0 |
| 103143 | Løn/starvsfólk | 29.091,00 | 134.000,00 | 134.000 | 134.000 | 134.0 | 134.0 |
| 103151 | Løn/avloysarar | 0,00 | 11.000,00 | 12.000,00 | 12.000 | 12.0 | 12.0 |
| 103222 | Løn/reingerð | 3.834,72 | 10.000,00 | 20.000,00 | 20.000 | 20.0 | 20.0 |
| 103405 | Ørtíðarløn | 0,00 | 10.000,00 | 11.000,00 | 6.000 | 6.0 | 6.0 |
| 113202 | Ferða- og dagpen. innanl. | 0,00 | 0,00 | 2.000,00 | 2.000 | 2.0 | 2.0 |
| 113243 | Ferða- og dagpen. uttanl. | 0,00 | 0,00 | 10.000,00 | 0,00 | 0.0 | 0.0 |
| 203308 | Lýsingar | 19.283,90 | 15.000,00 | 22.000,00 | 22.000 | 22.0 | 22.0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 204,90 | 9.000,00 | 12.000,00 | 12.000 | 12.0 | 12.0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 12.600,00 | 21.600,00 | 21.600,00 | 21.600 | 21.6 | 21.6 |
| 233051 | Innbúgv | 71.568,90 | 5.000,00 | 15.000,00 | 15.000 | 15.0 | 15.0 |
| 233155 | Prentlutir | 98.583,44 | 55.000,00 | 60.500,00 | 60.500 | 60.5 | 60.5 |
| 233259 | Postgjald | 4.112,80 | 15.000,00 | 16.500,00 | 16.500 | 16.5 | 16.5 |
| 233354 | Telefon - telex | 2.723,00 | 13.000,00 | 13.000,00 | 13.000 | 13.0 | 13.0 |
| 233409 | Leiga av maskinum | 1.270,00 | 12.000,00 | 12.000,00 | 12.000 | 12.0 | 12.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 45.437,78 | 6.000,00 | 30.000,00 | 30.000 | 30.0 | 30.0 |
| | | **288.710,44** | **316.600,00** | **391.600,00** | **376.600** | **376.6** | **376.6** |

**Fylgiskjal við grundgevingum til:**

Konto nr. 103143 Skrivstovufólkið var sett í 9. lønarflokk tað fyrsta árið. Men av tí at hetta er eitt sjálvstøðugt arbeiði við ábyrgd, skal tingast um eina uppflyting í 12. lønarflokk.

— — 103151 *Løn, avloysari* — avloysari í ferlutíðini + 1 mánaða eyka, tí møguliga fer skrivstovufólkið á skeið.

— — 103405 *Úrtíðarløn* — útyvir løn fyri yvirarbeiði, verður eisini søkt um eitt fólk (ørindagentu), tí at tørvur er á hesum.

— — 233051 *Innbúgv* — roknskapurin 1982/83 er uppá kr. 71.568,00, hetta eru etableringsútreiðslur. Núverandi ynskta upphædd er til at keypa undirvísingartilfar fyri.

— — 233155 *Prentlutir* — 1982/83 vóru stórinnkeyp vegna etablering.

— — 233409 *Leiga av maskinum* — útreiðslurnar eru munandi størri, vegna leigu og pappírsnýtslu til eitt avmyndingartól, ið vit hava til felags nýtslu saman við Heimahjálparaskipanini, Landsapotekaranum og Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum. Men hesin stovnur førir roknskap við nýtsluni hjá hvørjum einsæris, og fær so útleggið góðskrivað aftur. Hetta er minni kostnaðarmikið fyri allar fýra stovnarnar.

— — 233561 *Aðrar útreiðslur* — upphæddin er hækkað, tí í 1983/84 var ikki hugsað um trygging av starvsfólkinum, og eingin serstøk konto er til hetta.

**Viðmerkingar landsstýrisins:**
Landsstýrið hevur avgjørt hereftir at bóka útreiðslur til uttanlandsferðir hjá teimum smærru stovnunum á rakstrarstað 11758. Um stovnurin hevur brúk fyri uttanlandsferðum, verður sum vanligt søkt um farloyvi, og útreiðslurnar verða bókaðar á rakstrarstað 11758 og ikki á stovnin.

Tó verður rakstrarstað 11758 sundurgreinað soleiðis, at møguleiki er fyri at síggja, hvussu nógv hvør stovnur til eina og hvørja tíð hevur nýtt til uttanlandsferðir.

**Ad. konto § 11 - 11706 Búskaparráðið**

*Sambært skrivi dagfest 27. oktober 1983:*

F.L. j.nr. 400 - 36. Fíggjarløgtingslóg 1983/84, § 11 - 11706.

Iljálagt senda vit uppskot stovnsins til fíggjarløgtingslóg 1984/85 og ætlan fyri 1985/86 og 1986/87.

Uppskotið er sett upp sum heild fyri stovnin, rakstrarstað 11706, men eisini býtt á fíggjarstøðini undir stovninum.

## Ad. § 11 - 11706 BÚSKAPARRÁÐIÐ

| Kontonummar og navn | | 82/83 Roknskapur | 83/84 Játtan | 84/85 Uppskot frá Stovni | 84/85 Landsstýri | 85/86 Ætlan | 86/87 Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 83968 | Ársfrágreiðing, innt. | ÷ 7,2 | ÷ 18,0 | ÷ 20,0 | ÷ 20,0 | ÷ 20,0 | ÷ 20,0 |
| 103143 | Løn, starvsfólk | 883,7 | 973,0 | 987,0 | 987,0 | 998,0 | 1014,0 |
| 103151 | Løn, avloysarar | 86,4 | 75,0 | 80,0 | 80,0 | 83,0 | 85,0 |
Grundin til, at vit aftur venda okkum til myndugleikarnar við júst hesum er, at vit halda tað vera skeiva gongd at skera niður á hesum øki, tá vit siggja, at gongdin í okkara grannalondum er júst øvug. Í hinum norðanlondum og í Onglandi hava politikkararnir tikið princippavgerð um, at datalæra (informatikk) skal styrkjast heilt nógv komandi árini, tí teir meta, at nýggja teknologiin hevur avgerandi týdning fyri samfelagsmenningina. Hetta fingu vit greitt at vita, tá norski informatikkprofessarin Kristen Nygaard helt fyrilestur á Fróðskaparsetrinum í heyst. Um okkara ungdómur ikki skal verða eftirbátur, er tað neyðugt, at tey fáa frálæru innan hetta øki.

Í fólkaskúlanum gerst tað alsamt vanligari at skúlarnir hava heilt upp til 4 terminalar, og hesir næmingar koma um stutta tíð á okkara skúla, og tá er av týdningi, at vit eru fyrireikað at taka ímóti teimum.

Vegna lærararáðið

*Jette Hoydal*

Vegna mat/fys/dat/smf-bólkin

*Mads A. Winther*
*Zakarias Wang*
*S. Fjallsbak*
*Jóan Eyðfinnur Olsen*

Tórshavn 29/8-83

*Skjal 3b*

*Viðvíkjandi keypi av datatólum*

Datatólini skulu brúkast í frálæruni í datalæru. Lærugreinkonsulenturin í datalæru skrivar í frálæruætlanini, at endamálið við frálæruni er:

1. at meta um samspælið millum edv., einstaklingin og samfelagið

2. at duga at algoritmisera, at meta um og royna algoritmur.

3. at meta um ymisk aspekt í tí teknologisku menningini innan edvøkið.

Øll punktini í endamálsorðingini krevja sostatt, at næmingarnir læra at programmera:

ad 1 og 3. Fyri at gera metingarnar mugu næmingarnir duga at handfara eitt datatól og nýta tað sum amboð til loysn av eini uppgávu. fyri at datatól kann loysa eina uppgávu, má maskinan programmerast til hetta.

ad 2. Her stendur stutt sagt, at næmingarnir skulu læra at programmera.

Frálæran í programmering er skipað á sama hátt sum í øðrum lærugreinum, (sumt mugu næmingarnir læra heima og sumt í skúlanum).

- heima mugu næmingarnir læra seg programmeringarmálið og skriva algoritmur, sum skulu loysa ymisk problem og skriva programm.
- í skúlanum mugu næmingarnir læra at handfara datatól, skriva (tasta) programmini inn á eina datamaskinu, og kanna um hon skilir tey. Til seinast mugu næmingarnir royna (testa) programmini og á tann hátt kanna, um maskinan ger tað, ið ætlað var. Alt hetta skulu næmingarnir gera, meðan teir sita við eini datamaskinu. Um tað ikki skal taka alt ov langa tíð, má ein lærari vera hjástaddur og leiðbeina. Sostatt má arbeiðið við sjálvum datatólunum fara fram í tímunum.

*Skjal 3c*

Her í Hoydølum hava 12 næmingar 3 tímar um vikuna í datalæru. Teir fara ikki at duga at programmera, um teir bert sita $3 \times 45/12 = 12$ min. um vikuna við einari maskinu. Lærugreinkonsulenturin í datalæru vitjaði skúlan áðrenn summarfrítíðina. Hann segði, at um fleiri enn 3 næmingar arbeiða við hvørjari maskinu, kann endamálið í frálæruætlanini ikki røkkast. Hann helt, at hóskandi var, at ein flokkur við 12 næmingum hevði 8 maskinur.

Skúlin hevur í dag eina datamaskinu. Um frálæran í datalæru skal halda fram, mugu vit sum skjotast fáa 3 datamaskinur afturat. Hvør maskinan kostar 40.000 kr., og er tað tí bráðneyðugt við 120.000 kr. til keyp av datatólum.

Tann nýggjasta teknologiin, ið tekur seg fram allastaðni, er øll stýrd av yviskum datatólum. Tey fara tí í framtíðini at fáa alstóran týdning fyri einstaklingin og samfelagið sum heild. Um ikki í minsta lagi ein partur av okkara ungfólki lærir, hvussu hesi tól skulu brúkast, koma tey at standa heilt ófyrireikað, tá ið tey seinni skulu møta teim avbjóðingum, sum tann nýggja teknologiin ber í sær. Í hesum sambandi kann viðmerkjast, at Klaksvíkar Skúli hevur ætlan um keyp av 4 skermum, sum skulu brúkast í frálæruni í framhaldsdeildini.

Av tí at datatól vera nýtt víða hvar innan vinnulívið og tað almenna, er tað longu í dag ein fyrimunur hjá tí næminginum, ið søkir starv, at hann hevur havt datalæru á HF. Í skúlanum eru eisini dømi um næmingar, sum eru lidnir við HF, men sum koma aftur og spyrja, um teir ikki kunnu sleppa at taka datalæru afturat. Arbeiðsgevarin vil gjalda teimum løn fyri ta tíðina, tey ganga í skúla.

*Jóan Eyðfinnur Olsen*
Dátulærari

*Skjal 3 d.*

**J. nr. 30-00-26/82**

**Direktoratet for Gymnasieskolerne**
**og Højere Forberedelseeksamen**
**Amagertorv 14**
**1160 København K.**

*Til rektorerne for samtlige gymnasieskoler, studenterkurser og 2-årige hf-kurser.*

Skrivelse om forsøg med anvendelse af og undervisning i edb i gymnasiet

De *muligheder og problemer* som er skabt med udbredelsen af edb og anden informationsteknologi, er så væsentlige at man i en almendannende ungdomsuddannelse *nødvendigvis må arbejde med dem*. Det er naturligt at behandle dem ikke blot i et enkel, men i *flere fag*, da der er tale om et meget komplekst område med *såvel naturvidenskabelige som humanistiske og samfundsvidenskabelige aspekter*.

Der kan arbejdes på grundlag af tekstmateriale, men en perspektiverende undervisning i disse emner skal desuden give eleverne førstehåndserfaringer. Blandt disse erfaringer bør *for det første være brug af skolens dataanlæg*, gerne således at datamaskinen med egnede programmer udnyttes i undervisningen i forskellige fag. Det kan fx være til simulationer eller som regneteknisk hjælpemiddel. For det andet bør eleverne erfare hvorledes dataanlæg fungerer i en virksomhed eller institution, om muligt ved besøg det pågældende sted.

Forsøgsforløbet består af et indledende *fælleskursus på ca. 30 timer* der *senere følges op tværfagligt eller i de enkelte fag*. Det centrale arbejde med de problemer der er nævnt ovenfor, foregår i de enkelte fag i løbet af 2. og 3.g, mens fælleskurset som normalt ligger i 1.g, skal give *alle elever et fælles udgangspunkt*. Det er derfor væsentligt at så vidt muligt alle elever i 1. g (eventuelt kun 1.gm eller 1. gs) deltager i forsøget.

Fælleskurset har dobbelt sigte. Det skal for det første danne en fælles basis, hvor der gives en sitroduktion til den senere behandling af edb og informationsteknologi under de forskellige fags synsvinkler. For det andet skal fællesdelen rumme en indføring i brugen af skolens maskinel. Den-

ne indføring skal være så grundig at faglærerne senere kan regne med at eleverne selv kan betjene maskinerne når programmer foreligger.

Forsøget skal danne udgangspunkt for overvejelser over hvorledes en undervisning i edb for samtlige gymnasieelever kan tilrettelægges.

*Skjal 4.*

Hoydalar 28.-8.-1982

**Viðvíkjandi fysikksavninum á Føroya Studentaskúla og hf-skciði:**

Tann stóra næmingatilgongdin hevur tikið hart uppá hetta, fleiri av teim stóru tólunum eru brotin, til dømis Franck-Hertz-rørið, oscilloskopið og stroboskopið. Geiger-Müller-teljarin fungerar ikki longur og tað sama kann sigast um útstýrið til fastsetan av Plancksa konstanti. At umvæla hesi tól loysir seg helst ikki, deils eru umvælingar altíð kostnaðarmiklar og deils eru tólini so gomul (16 ár) at vit meta at tað er best at keypa nýggj.

Nýggj tól, sum mugu keypast eru: ein vekt, ein streymforsýning, ein mikrokompressara og fleiri av teim vanligu elektrisku málitólunum (tað er fleiri ferðir komið fyri, at ikki allir næmingarnir kunnu gera venjingar sama tíma vegna tóltrot).

Tá vit aftrat hesum leggja útreiðslur til tað vanliga viðlíkahaldið, koma vit (fysikklæ rararnir) til at hetta kann gerast fyri umleið 100.000 kr., tí verður søkt um hesa upphædd.

Vinarligast
fysikklæ rararnir á Føroya Studentaskúla

*S. Fjalsbak*
*Mads A. Winther*
*Magni í Horni*

*Henriette Svenstrup*
*Pól Jespersen*
*Jákup í Gerðinum*

*Skjal 5*

**Viðvíkjandi ynski um Játtan til musikkfakið fíggjarárið 84/85**

Vit hava sett fram ynski um 60.000 kr. til eitt eingangskeyp av instrumentum, og tað vil fyrst og fremst siga tað mest neyðturviliga instrumentariið til rock- og jazztónleik.

Eitt slíkt er neyðugt, um vit skulu vera før fyri at fylgja tí partinum av ætningslinjunum fyri musikkfakið, ið verður kallað aktiv musikkøvelse (sí viðlagda kopi). Tankin er, at tá ið næmingarnir í skematímunum ikki fáa tað neyðuga høvið til sjálvir at vera aktivt musicerandi, skal skúlin bjóða teimum so nógvar og so fjølbroyttar møguleikar sum gjørligt fyri tí uttan fyri skematímarnar, og tá helst á umráðum, sum teir ikki fáa tilboð um uttan fyri skúlan.

Er tað nakað, sum næmingarnir hava ringt við at koma framat, so eru tað møguleikarnir fyri at spæla saman á elektriskum instrumentum, t.v.s. rocktónleik og tílíkt. Tað eru bara teir heilt fáu dreingirnir, teir ið spæla fyri pengar, sum hava ráð til at hava slík instrumentir. Tey allarflestu eru áhoyrarar, altso passiv. Júst millum ungdómar í 16 - 19 ára aldrinum hevur hesin tónleikur stóran áhuga og tí eisini stóran týdning.

Vit hava á skúlanum roynt at bjóða næmingunum so nógvar møguleikar, sum møguligt. Í ár hava vit fyrisligið samanspæl í rock- og jazzbólkum, kórsang, bæði vanligan og rytmiskan (rock, popp, lættari tónleik) vísusang við samanspæli, strúkara- og blásarasamanspæl og sum nakað nýtt er ætlanin at gera eina føroyska musical. Tað hevur víst seg, at serliga nógvir næmingar vilja vera við í rock- og jazzsamanspæli, kórsangi og musicalarbeiðinum. Umstøðurnar eru bara ikki til tess. Rock- og jazztónleikur, rytmiskur kórsangur og musicaltónleikur eru ótonkjandi uttan eitt vanligt elektriskt anlegg og sanganlegg. Eitt sanganlegg kann harafturat brúkast til onnur endamál, eitt nú sjónleikir.

Vit hava verið hjá Simma Musikkhús og fingið leysligа mettar prísir fyri eitt bíligt, men forsvarligt anlegg, og sær listin soleiðis út:

| | |
|---|---|
| Gittarforsterkari | 6.500 kr. |
| Bassforsterkari | 7.500 kr. |
| 4 mikrofonir | 6.000 kr. |
| 4 stativir | 2.000 kr. |
| Sanganlegg | 14.000 kr. |
| Trummusett | 10.000 kr. |
| Congas | 5.000 kr. |
| **Ialt** | **51.000 kr.** |

*Skjal 5 a*

Congas er eitt rytmuinstrument, sum er vanligt í nógvum formum fyri samanspæli, og tí er tað komið við. Vit mugu leggja 9.000 kr. afturat til at skaffa nýggjar sangbøkur og plátur fyri. Henda upphædd er heldur lítil til endamálið skal tó sigast.

At endanum skal líka nevnast, at slík anlegg, sum talan er um her, eru heilt vanlig á donskum gymnasium, og at tað eru føroyskir kommunuskúlar, sum eru væl betri fyri í so máta enn Studentaskúlin í Hoydølum.

Vegna sanglærararnar:

*Zacharias Sørensen* *E. Sørensen*

*Skjal 5b*

**UNDERVISNINGSMINISTERIET**
**Direktoratet for gymnasieskolerne**
**og højere forberedelseseksamen**

*Til samtlige rektorer for gymnasier og 2-årige hf-kurser.*

| Dato | ? | Direkte (?) | Journal nr. |
|---|---|---|---|
| Den 2. juni 1982. | (?)/ta | | 17-01-00-02/82 |

*Vedr. frivillig musik*

Fagkonsulenten i musik har udarbejdet nedenstående retningslinier for frivillig musik (jfr. undervisningsvejledningen for gymnasieskolen (1971) og hf-bekendtgørelsens § 4 stk. 9). Rektor anmodes om at gøre musiklærerne bekendt med denne skrivelse.

P. d. v.

Johs. Nymark Jensen
undervisningsinspektør

*Om frivillig musik*

Den frivillige musikundervisning er en naturlig videreførelse af det punkt i bekendtgørelsen for faget som omhandler *aktiv musikudøvelse.* Når bekendtgørelsen lægger så stor vægt på denne del af den skemabundne undervisning, er det fordi de to andre undervisningsområder, som giver eleverne en forståelse af musik som socialt kulturfenomen og en viden om musikalsk-æstetiske forhold, ikke i sig selv fører dem ud af en passiv forbrugerrolle; det har den aktive musikudøvelse derimod mulighed for.

Den frivillige musikundervisning bør fungere som overbygning på den skemabundne undervisning, og til dels også som et suplement til de kommunale musikskolers undervisning og andre tilbud om aktiv musikudøvelser der gives til elever i folkeskolealderen.

(síða 154 í fylgiskjølunum er ólesandi)

*Skjal 6*

*30. august 1983*

Jens Frederiksen:

*Kommentarer til ønskerne om inventar i formning.*

De fire ønsker repræsenterer det, der er absolut påkrævet for at en formningsundervisning kan etableres.

*Lysbilledfremviseren,* der benyttes til at vise dias f.eks. forskellige perioders kunst/enkelte kunstneres værker er en nødvendighed for at lære eleverne billediagttagelse/analyse. Et effektivt og godt udstyr er vigtigt, da det er meget almindeligt, at en time indledes/afsluttet med en lysbilledpræsentation/diskussion som oplæg til/afslutning på elevernes praktiske arbejde.

*Trykpresseren* er en forudsætning for at bekendtgørelsens krav om kendskab til et praktisk arbejde med »sort/hvidt« (læs: grafik) kan indfries. Pressen, som består af en tryk flade, en valse og et »håndsving« (drives manuelt) bruges kort og godt til at trykke elevernes egne grafiske værker i f.eks. linoleum, zink og træ.

*Skæremaskinen* - et bord med en milimeterskala, en formatinddeling, anlægslinial og en afskærmet kniv - er formningslokalets »praktiske gris«, idet den bruges til allehånde praktiske skæreopgaver, hvor der skal skæres præcist og i stort omfang. Dens force er, at den kan benyttes ikke blot til karton, men f. eks. også til fotopapir, linoleum, finer, pergamentpapir m.v.

*Fotoudstyret* ligger i forlængelse af »sort/hvidt« beskæftigelsen på den måde at eleverne foruden den håndværksprægede grafik også får mulighed for at beskæftige sig med den »automatiske« sort/hvidt billedskaben.

Som det fremgår indgår sort/hvidt centralt i argumentationen. Det er ikke en tilfældighed. En almindelig progression i et formningsforløb vil akkurat bestå i, at man starter med »sort/hvid« og går til farve (1. år). Ønskerne er således skræddersyede til at kunne imødekomme en 1. års-undervisning . »Farve« kræver nemlig imodsætning til »sort/hvid«

ikke tekniske hjælpemidler, men kan groft sagt gennemføres ved hjælp af farvekridt/akvarel/papirklip m.m.

---

Hetta er frágreiðing viðv. k. 253093, pkt. 13. Lærari: Jens Frederiksen (fak: dansk-tilevning; hann hevur í ár tó bert danskt).

**Uppskot til fíggjarætlan fyri raksturin av kostdeild Føroya Studentaskúla og HF-skeið fíggjarárið 1984/85**

*Rakstrarstað nr. 14257*

| Konto | | Roknskapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýris. 1984/85 | Ætlan 1985/86 | Ætlan 1986/87 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 83809 | Leiguinntøkur | ÷ 52.026,00 | ÷ 50.0 | ÷ 50.0 | ÷ 50.0 | ÷ 50.0 | ÷ 50.0 |
| 83929 | Næmingagjald (skúlar) | ÷ 392.600,00 | ÷ 454.0 | ÷ 454.0 | ÷ 454.0 | ÷ 454.0 | ÷ 454.0 |
| 103143 | Løn/starvsfólk | 0,00 | 165.0 | 170.0 | 170.0 | 170.0 | 170.0 |
| 103222 | Løn/reingerð | 175.634,81 | 198.0 | 225.0 | 225.0 | 225.0 | 225.0 |
| 103288 | Løn/onnur | 1.104.446,23 | 1.560.0 | 1.560.0 | 1.560.0 | 1.560.0 | 1.560.0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 319.020,17 | 296.0 | 350.0 | 350.0 | 350.0 | 350.0 |
| 213702 | Ognartrygging | 0,00 | 20.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 128.420,00 | 192.0 | 212.0 | 212.0 | 212.0 | 212.0 |
| 233051 | Innbúgv | 23.206,93 | 40.0 | 50.0 | 50.0 | 50.0 | 50.0 |
| 233354 | Telefon og telex | 16.919,55 | 10.0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 |
| 253107 | Kostur | ÷ 231.580,11 | ÷ 150.0 | ÷ 200.0 | ÷ 200.0 | ÷ 200.0 | ÷ 200.0 |
| 253306 | Amboð | 36.773,32 | 45.0 | 50.0 | 50.0 | 50.0 | 50.0 |
| 253314 | Aðrar umsitingarútr. | 180.615,55 | 190.0 | 250.0 | 250.0 | 250.0 | 250.0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 49.743,93 | 90.0 | 70.0 | 70.0 | 70.0 | 70.0 |
| 237 | | **1.358.574,38** | **2.152.0** | **2.268.0** | **2.268.0** | **2.268.0** | **2.268.0** |

**Viðmerkingar til roknskapin fyri fíggjarárið 1982/83.**
Munurin millum játtanina 82/83 og roknskapin stendst mest av, at kostnæmingarnir gjørdust fleiri enn roknað varð við í uppskotinum, og at sølan av mati varð størri enn mett.

*ad. 213806 Leiguútreiðslur*

Her er talan um húsini í Varðagøtu nr. 30, sum verða leigað til næmingabústað.

*ad. 253107 Kostur*

Hetta konto, sum vísir seg torføi at meta um, men gongur alt sína vanligu gongd, so kann væntast ein inntøka t.v.s. munur millum keyp og sølu av mati onkustaðni um kr. 200.000.

*ad. 253306 Amboð*

Á hesa konto verða bókað øll keyp til kantinuna og køkin av køksbúnyttum og øðrum køksamboðum.

*ad. 253314 Aðrar umsitingarútreiðslur*

Húsini eru: Gamla hús, Nýggja hús, Læknahúsini, í Stórustovu (Hoydalsvegur 1). Tey eru øll gomul og krevja ábøtur, men her verður serliga hugsað um vindeyguni í Læknahúsunum. Har lekur í eyri og seyri, og gjøsturin stendur tvørtur ígjøgnum húsini.

Um nýggj vindeygu verða gjørd, verður eisini spardur peningur til olju ella kanska rættari, meira nytta fæst burtur úr oljuni, sum nýtt verður. Mett at kosta kr. 100.000. Tilfar til at umvæla hallarnar, sum detta niður, um einki verður gjørt við teir í bræði: kr. 50.000.

Mesta arbeiðið verður gjørt av okkara egna fólki: tí verður bert roknað við kostnaði av tilfari. Hinar kr. 100.000 á hesi konto verða nýttar til máling, tapetsering og annað umvælingararbeiði, sum er neyðugt á hvørjum ári.

*ad. 253903 Aðrar útreiðslur*

Á hesa konto hava verið bókaðar umframt »aðrar útreiðslur« eisini tryggingar og renovatión. Tryggingar hava nú serliga konto, og renovatión verður nú bókað á konto *213105: El, hiti og vask.*

Eftir á hesi konto verða so óvæntaðar útreiðslur og útreiðslur, sum standast av arbeiði við at fríðka uttan um húsini.

*Ásmundur Johannesen*
fyristøðumaður

*Arnbjørn Mortensen*
rektari

FØROYA SJÓMANSSKÚLI
TELEFON (042) 1 17 49

3800 Tórshavn, 18. august 1983
Nr. 331

22. august 1983

Landsskúlafyrisitingin
Falkavegur 6
3800 Tórshavn

**Fíggjarlógaruppskot 1984/85 fyri Føroya Sjómansskúla, 14307**

| Konto | | Roknskapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýris. 1984/85 | Ætlan 1985/86 1000 kr. | Ætlan 1986/87 1000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103048 | Løn/tænastumenn | 1.006.913 | 1.258.700 | 1.294.000 | 1.294.000 | 1.294.0 | 1.294.0 |
| 103127 | Løn/lærarar | 896.230 | 801.700 | 753.000 | 753.000 | 753.0 | 753.0 |
| 103143 | Løn/starvsfólk | 188.318 | 210.400 | 200.000 | 200.000 | 200.0 | 200.0 |
| 103222 | Løn/reingerð | 257.000 | 274.100 | 286.000 | 286.000 | 286.0 | 286.0 |
| 103288 | Løn/onnur | 378.323 | 306.000 | 320.000 | 320.000 | 320.0 | 320.0 |
| 103405 | Úrtíðarløn | 557.917 | 568.000 | 635.000 | 635.000 | 635.0 | 635.0 |
| 113202 | Ferða- og dagp. innanl. | 765 | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 10.0 | 10.0 |
| 113243 | Ferða- og dagp. uttanl. | 000 | 40.000 | 50.000 | 50.000 | 50.0 | 50.0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 131.745 | 152.000 | 175.000 | 175.000 | 175.0 | 175.0 |
| 213503 | Umsiting | 82.865 | 100.000 | 115.000 | 115.000 | 115.0 | 115.0 |
| 213702 | Ognartrygging | 20.290 | 20.000 | 25.000 | 25.000 | 25.0 | 25.0 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 233051 | Innbúgv | 6.411 | 30.000 | 35.000 | 35.000 | 35.0 | 35.0 |
| 233359 | Telefon & telex | 17.804 | 25.000 | 28.000 | 28.000 | 28.0 | 28.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútr. | 42.189 | 50.000 | 57.000 | 57.000 | 57.0 | 57.0 |
| 253306 | Amboð | 525.768 | 300.000 | 350.000 | 350.000 | 350.0 | 350.0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 19.041 | 44.100 | 50.000 | 50.000 | 50.0 | 50.0 |
| 253977 | Eldsløkking | 80.529 | 110.000 | 125.000 | 125.000 | 125.0 | 125.0 |
| | | **4.212.108** | **4.300.000** | **4.508.000** | **4.508.000** | **4.508.0** | **4.508.0** |

**Viðmerkingar**

*ad 103048*

| | |
|---|---|
| Stjóri | 232.916 |
| Varastjóri | 193.955 |
| 1 sjómansskúlalærari | 163.436 |
| 1 — | 186.515 |
| 1 — | 152.088 |
| 1 — | 163.436 |
| 1 — | 157.609 |
| 1½ % feriuløn | 18.750 |
| Prístalshækking 1.015 (5(4 × 105 × 12)) | 25.578 |
| | **1.294.283** |

*ad 103127*

| | |
|---|---|
| 1 sjómansskúlalærari | 163.436 |
| 1 — | 141.907 |
| 1 — | 137.216 |
| 1 — | 137.216 |
| 1 — | 137.216 |
| 1½ % feriuløn | 10.755 |
| Prístalshækking 1.015 (5(4 × 105 × 12)) | 25.578 |
| | **1.753.324** |

*ad 103143*

| | |
|---|---|
| Skúlatænari | 129.918 |
| ½ starvsfólk | 62.262 |
| 1½ % feriuløn | 2.883 |
| Prístalshækking 1.015 (4 × 105 × 12) | 5.116 |
| | **200.179** |

*ad 103222*

| | |
|---|---|
| 5 reingeringskvinnur á kr. 45.394 í ársløn | 226.970 |
| 1½ % feriuløn | 3.405 |
| Høvuðsreingering | 30.000 |
| Prístalshækking 1.105 (5(4 × 105 × 12)) | 25.578 |
| | **285.951** |

*ad 103288*

| | |
|---|---|
| 1 tímalærari, sjórætt | 118.560 |
| 1 tímalærari, heilsulæra | 72.960 |
| 9½ % feriuløn | 18.195 |
| Vikarløn, vegna sjúku, eyka útb. hjá lærarum, eykaskeið | 100.000 |
| Dýrtíðarhækking 1.015 (2(4 × 105 × 12)) | 10.230 |
| | **319.945** |

*ad 103405*

| | |
|---|---|
| Úrtíðarlønir | 568.665 |
| 1½ % feriuløn | 8.530 |
| Prístalshækking 1.015 (0,1 × 568.665) | 57.720 |
| | **634.915** |

*ad 253306*

| | |
|---|---|
| Til viðlíkahald, endurnýggjan og umvæling av tólum | **350.000** |

*ad 253977*

| | |
|---|---|
| Útreiðslur til eldsløkkingarskeið, læknakanningar og annað hesum viðvíkjandi | **125.000** |

*ad øllum*

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingaruppskoti seinni, um umstøðurnar broytast munandi.

Vit loyva okkum aftur í ár at minna á og skunda undir okkara tilbygningsprojekt.

KLAKKSVÍKAR SJÓMANSSKÚLI

Telefon 5 6128

3870 Klaksvík

**Rakstrarstað Nr. 14409**
**Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1984/85**

*Krónur 1.000,-*

| Konto Nr. | Kontonavn | Roknskapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýris. 1984/85 | Ætlan 1985/86 1000 kr. | Ætlan 1986/87 1000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 83809 | Leiguinntøkur | 0,00 | ÷ 4,- | ÷ 4,2 | ÷ 4.2 | ÷ 4.2 | ÷ 4.2 |
| 103048 | Løn/tænastumenn | 185.045,74 | 215,- | 230,- | 230.0 | 230.0 | 230.0 |
| 103127 | Løn/lærarar | 377.535,56 | 440,- | 480,0 | 480.0 | 480.0 | 480.0 |
| 103143 | Løn/starvsfólk | 0,00 | 5,- | 5,- | 5.0 | 5.0 | 5.0 |
| 103151 | Løn/avloysarar | 3.089,60 | 30,- | 30,- | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 103222 | Løn/reingerð | 34.445,75 | 40,- | 50,- | 50.0 | 50.0 | 50.0 |
| 103288 | Løn/onnur | 4.438,20 | 20,- | 40,- | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 103405 | Løn/úrtíðarløn | 101.144,40 | 30,- | 60,- | 60.0 | 60.0 | 60.0 |
| 103509 | Samsýningar | 6.189,44 | 6,- | 8,- | 8.0 | 8.0 | 8.0 |
| 113052 | Útiviðbót | 0,00 | 8,- | 8,- | 8.0 | 8.0 | 8.0 |
| 113202 | Ferða- & dagp. il. | 1.715,25 | 10,- | 12,- | 12.0 | 12.0 | 12.0 |
| 113243 | Ferða- & dagp. ul. | 0,00 | 5,- | 10,- | 10.0 | 10.0 | 10.0 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 203204 | Prenting | 1.420,00 | 2,- | 2,- | 2.0 | 2.0 | 2.0 |
| 203308 | Lýsingar | 265,40 | 5,- | 6,- | 6.0 | 6.0 | 6.0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 53.582,94 | 40,- | 60,- | 60.0 | 60.0 | 60.0 |
| 213408 | Umvælingar v.m. | 0,00 | 20,- | 20,- | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 213503 | Umsiting | 19.491,50 | 20,- | 20,- | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 213607 | Størri umbyggingar | 0,00 | 0,- | 0,- | 0.0 | 0.0 | 0.0 |
| 213702 | Ognartrygging | 30.347,00 | 6,- | 33,- | 33.0 | 33.0 | 33.0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 39.742,08 | 90,- | 140,- | 100.0 | 100.0 | 100.0 |
| 233051 | Innbúgv | 0,00 | 20,- | 20,- | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 233259 | Postgjald | 0,00 | 7,- | 8,- | 8.0 | 8.0 | 8.0 |
| 233354 | Telefon og telex | 5.850,00 | 7,- | 8,- | 8.0 | 8.0 | 8.0 |
| 233409 | Leiga av maskinum | 0,00 | 0,- | 0,- | 0.0 | 0.0 | 0.0 |
| 233504 | Sakkøn hjálp | 0,00 | 0,- | 2,- | 2.0 | 2.0 | 2.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútr | 3.375,45 | 8,- | 10,- | 10.0 | 10.0 | 10.0 |
| 253077 | Ekskursiónir | 9.800,00 | 25,- | 10,- | 10.0 | 10.0 | 10.0 |
| 253085 | Bókakeyp og innbind. | 14.165,00 | 15,- | 20,- | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 253107 | Kostur | 72.910,00 | 90,- | 140,- | 110.0 | 110.0 | 110.0 |
| 253306 | Amboð | 90.848,92 | 90,- | 60,- | 40.0 | 40.0 | 40.0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 8.526,90 | 50,- | 50,- | 40.0 | 40.0 | 40.0 |
| 253977 | Eldsløkking | 0,00 | 0,- | 25,- | 25.0 | 25.0 | 25.0 |
| **14409** | | **1.063.929,94** | **1.300,-** | **1.562,8** | **1.432.8** | **1.432.8** | **1.432.8** |

## FØROYA FÓLKAHÁSKÚLI: Uppskot til figgjarløgtingslóg fyri 1984/85:

| | Roknskapur | Játtað 83/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 Uppskot til játtan 84/85 | Uppskot landsstýr 1984/85 | Ætlan 1985/86 t000 kr. 85/86 | Ætlan 1986/87 1000 kr. 86/87 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Leiðaraløn | 100% av 175.485 kr = 175.483 kr | 177.000 | 100% av 185.000 = 185.000 | 185.000 | 185.000 | 185.000 |
| Læraralønir | | 363.039 | 70% av 543.000 = 380.100 | 380.100 | 380.100 | 380.100 |
| Yvirtíð | 70% av 667.440 kr = 467.208 kr | 73.500 | 70% av 115.000 = 80.500 | 80.500 | 80.500 | 80.500 |
| Eykahjálp Arbeiðsgent | | 87.500 | 70% av 135.000 = 94.500 | 94.500 | 94.500 | 94.500 |
| Innbúgv | 50% av 24.997 kr = 12.498 kr | 20.000 | 50% av 44.000 = 22.000 | 22.000 | 22.000 | 22.000 |
| Umvælingar | 70% av 189.037 kr = 132.325 kr | 119.000 | 70% av 187.000 = 130.900 | 130.900 | 130.900 | 130.900 |
| Frálærutilfar | 70% av 118.713 kr = 83.099 kr | 84.000 | 70% av 132.000 = 92.400 | 92.400 | 92.400 | 92.400 |
| Ljós/hiti | 70% av 114.108 kr = 79.875 kr | 77.000 | 70% av 122.000 = 85.000 | 85.000 | 85.000 | 85.000 |
| Tryggingar | 70% av 12.834 kr = 8.983 kr | 8.400 | 70% av 13.000 = 9.100 | 9.100 | 9.100 | 9.100 |
| Reingerð | 70% av 7.989 kr = 5.592 kr | 7.000 | 70% av 11.000 = 7.700 | 7.700 | 7.700 | 7.700 |
| Aðrar útr: (skrivst.tele.) (blaðhald.lýsing) | 70% av 62.410 kr = 43.687 kr | 28.000 | 70% av 60.000 = 42.000 | 42.000 | 42.000 | 42.000 |
| Ymist | 70% av 696 kr = 487 kr | 3.500 | 70% av 5.600 = 3.900 | 3.900 | 3.900 | 3.900 |
| Lærarar á skeið | 70% av 6.777 kr = 4.744 kr | 7.000 | 70% av 11.000 = 7.700 | 7.700 | 7.700 | 7.700 |
| Rentuútreiðslur | 70% av 78.585 kr = 55.009 kr | 52.500 | 70% av 85.000 = 59.500 | 59.500 | 59.500 | 59.500 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. Rakstrarstudningur tilsamans [1] | 1.068.990 kr | 1.107.439 | | 1.200.300 | 1.200.300 | 1.200.300 | 1.200.300 |
| 2. Byggistudningur | 60.000 kr | 60.000 | (8. gjald) | 60.000 | 60.000 | 60.000 | 60.000 |
| 3. Eftirlønir (Marius & Jóhannes) | 179.933 kr | 175.000 | | 192.500 | 192.500 | 192.500 | 192.500 |
| 4. Næmingastudningur | 311.250 kr | 420.000 | | 460.000 | 460.000 | 460.000 | 460.000 |
| (upp til 70% av næmingagjaldinum) | | (40 næm. í 10 mðr. á 1500 kr. × 70%) | | | | | |
| | | **1.762.439** | | **1.912.800** | **1.912.800** | **1.912.800** | **1.912.800** |

1) Av hesum er útgoldið 952.496 kr, søkt er um regulering fyri nakað av restini, nakað átaka vit okkum sjálv.
2) Av hesum eru 117.873 kr útgoldnar, 49.127 kr vóru av misgáum útgoldnar í 81/82, søkt er um regulering fyri tær írestandi 12.933 kr.
3) Hetta er 7. gjald á 60.000 kr, sum er útgoldið í hesum fíggjarárinum, á viðmerking í fíggjarlógini stendur, at tað er 6. gjald, men tað er skeivt. Á næstu fíggjarlóg kemur sostatt 8. gjald at verða útgoldið.
4) Hetta talið er maksimum tal — nýtslan veldst um tal av næmingum og inntøkuviðurskiftum teirra.

Hjálagt verður sent uppskot til fíggjarløgtingslóg fyri 84/85 fyri Føroya Fólkaháskúla.

Uppskotið er at kalla tað sama, sum tann metingin, ið latin varð inn saman við uppskotinum fyri verandi fíggjarár, bert smávegis rættingar eru gjørdar viðvíkjandi lønunum. Tølini fyri 85/86 og 86/87 eru somu sum 84/85 tølini, bert hækkað 10% hvørt árið fyri prís- og lønarvøkstur.

Skjal 1 vísir teir fýra bólkarnar (kontoirnar), sum rakstur okkara er býttur sundur á.

Skjal 2 vísir lønir okkara, sum tær eru í løtuni.

Skjal 3 er gjølligari greining av skjali 1, og vísir eisini tølini fyri tey tvey fylgjandi fíggjararini.

*Skjal 1.*

| **Kontonummar og navn** | **Roknskapur 1982/83** | **Játtan 1983/84** | **Uppskot 1984/85** |
|---|---|---|---|
| 373106 Rakstrarstudningur | 1.068.990 | 1.107.439 | 1.200.300 |
| 313111 Rentustudn. (byggist.) | 60.000 | 60.000 | *) 60.000 |
| 103558 Eftirlønir | 179.933 | 175.000 | 192.500 |
| 373051 Næmingastudningur | 311.250 | 420.000 | 460.000 |

*) 8. gjald av 10.

**Húsarhaldsskúli Føroya**
**3870 Klaksvík**

*Klaksvík 1. 20.08.1983*

Landsskúlafyrisitingin
J. Broncksgøta
3800 Tórshavn

## Fíggjarætlan 1984/85

| | | |
|---|---|---|
| Matur | kr. | 65.500,00 |
| Leiga av undirv. hølum | - | 95.500,00 |
| Olja | - | 65.500,00 |
| Ravmagn | - | 36.000,00 |
| Hjálpilærarar | - | 55.800,00 |
| Viðlíkahald | - | 57.000,00 |
| Telefon | - | 7.500,00 |
| Skrivstovuhald v.m. | - | 16.000,00 |
| Tryggingar | - | 5.300,00 |
| Rentur | - | 35.000,00 |
| Ymist | - | 6.700,00 |
| Náttarvakt | - | 60.000,00 |
| Skúlaleiðarin | - | 178.000,00 |
| | **kr.** | **683.300,00** |

**Føroya Landsstýri at gjalda:**

| | | |
|---|---|---|
| Leiga av undirv. hølum | kr. | 95.500,00 |
| Olja | - | 65.000,00 |
| Ravmagn | - | 36.000,00 |
| Hjálpilærarar | - | 55.800,00 |
| Viðlíkahald | - | 57.000,00 |
| Telefon | - | 7.500,00 |
| Skrivstovuhald v.m. | - | 16.000,00 |
| Tryggingar | - | 5.300,00 |
| Rentur | - | 35.000,00 |
| Ymist | - | 6.700,00 |
| Náttarvakt | - | 60.000,00 |

| | | |
|---|---|---|
| 70% av | kr. 439.800,00 | kr. 307.860,00 |
| Skúlaleiðarin | | - 178.000,00 |
| Eftirstøða 1982 | | |
| kr. 372.013,23 ÷ kr. 356.757,17 | | - 15.256,09 |
| | | **kr. 501.116,09** |

Figgjarætlanin fyri 1985/86 og 1986/87 kemur at hava somu upphæddir í 1984/85 prislegu, treytað av at næmingatalið ikki økist.

*Agnar á Dul*

§ 14

**Rakstrarstað nr. 14656: Landsmiðstøð fyri nndirvísingarambоð.**

**í 1000 kr.**

| Konto | Navn | Roknskapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýris. 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 83809 | Leiguinntøka | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 103048 | Løn/tænastumenn | 0 | 0 | 121.99 | 121.99 | 162.65 | 320.0 |
| 103143 | Løn/starvsfólk | 0 | 0 | 182.97 | 182.97 | 238.92 | 350.0 |
| 103222 | Løn/reingerð | 0 | 0 | 48.75 | 48.75 | 65.0 | 65.0 |
| 103405 | Úrtíðarløn | 0 | 0 | 5.5 | 5.5 | 7.3 | 7.3 |
| 103509 | Samsýningar | 0 | 0 | 8.25 | 8.25 | 11.0 | 11.0 |
| 113202 | Ferða- og dagpeningur | 0 | 0 | 6.6 | 6.6 | 8.8 | 8.8 |
| 203204 | Prenting | 0 | 0 | 123.75 | 123.75 | 165.0 | 200.0 |
| 203308 | Lýsingar | 0 | 0 | 6.6 | 6.6 | 8.8 | 10.0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 0 | 0 | 16.5 | 16.5 | 22.0 | 22.0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 0 | 0 | 105.47 | 105.47 | 140.63 | 140.63 |
| 233051 | Innbúgv | 0 | 0 | 55.0 | 55.0 | 27.5 | 27.5 |
| 233259 | Postgjald | 0 | 0 | 16.5 | 16.5 | 22.0 | 22.0 |
| 233354 | Telefon og telex | 0 | 0 | 8.0 | 8.0 | 10.6 | 10.6 |
| 233409 | Leiga av maskinum | 0 | 0 | 20.0 | 20.0 | 26.5 | 26.5 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 253561 | Aðrar skrivstovuútr. | 0 | 0 | 30.0 | 30.0 | 40.0 | 40.0 |
| 253085 | Bókakeyp og innbind. | 0 | 0 | 715.0 | 715.0 | 770.0 | 880.0 |
| **Tilsamans** | | | | **1.470.88** | **1.470.88** | **1.726.7** | **2.141.33** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Landskassans partur: | 1.198.788 | 1.432.243 | 1.760.330 |
| Ríkiskassans partur: konto 103048 | 67.092 | 89.457 | 176.000 |
| konto 253085 | 205.000 | 205.000 | 205.000 |

Í fíggjarætlanini fyri undirvísingarverkið fyri 1983/84, hevði Landsskúlafyrisitingin gjørt uppskot til fíggjarætlan fyri Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð, men var uppskotið strikað undir viðgerðini av fíggjarlógini í landsstýrinum.

Uppskotið er tikið við aftur í ár, og verður víst til viðmerkingarnar til uppskotið frá seinasta ár, sum eru hjálagdar.

**Viðmerkingar til § 14 - 14656 í uppskotinum fyri fíggjarárið 1983/84**
**Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð**

Eftir § 25, 4 stk. í løtgingslóg um fólkaskúlan, lóg nr. 21 frá 22. mars 1979, eigur at verða sett á stovn ein landsmiðstøð fyri undirvísingarverkið.

Landsstýrið setti í december 1979 eina nevnd til at gera reglur um skúlabókasøvn og landsmiðstøð, og handaði nevndin landsstýrinum álit í málinum 4. juni 1981.

Við støði í hesum áliti hevur Landsskúlafyrisitingin gjørt uppskot til kunngerð um landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð og um skúlabókasøvn, sum aftan á at hava verið góðkent av Landsskúlaráðnum, varð sent landsstýrinum 10. juli 1982.

Landsstýrið sendi 12. juli 1982 fyrisitingini uppskotini aftur við tí viðmerking, at áðrenn landsstýrið kundi taka støðu til uppskotini var Landsskúlafyrisitingin biðin um:

1. at senda Kommunufelag Føroya kunngerðina um skúlabókasøvn til ummælis
2. at kanna, um ríkiskassin eftir galdandi reglum kemur at luttaka í útreiðslunum til landsmiðstøðina
3. at gera uppskot til komandi løgtingsfíggjarlóg um fíggjarætlan fyri landsmiðstøðina at byrja 1. august 1983.
4. at gera avtalu við Føroya Skúlasavn um, at landsmiðstøðin yvirtekur ognir tess pr. 1. august 1983, samstundis sum savnið heldur uppat
5. at greiða frá, hvørja støðu skúlabókagrunnurin fær undir nýskipanini.

Við støði í hesi áheitan pkt. 3 hevur Landskúlafyrisitingin gjørt fylgjandi uppskot til fíggjarætlan fyri landsmiðstøðina.

Í uppskotinum til kunngerð stendur, at landsmiðstøðin skal vera partur av Landsskúlafyrisitingini, sum stendur undir § 11 á løgtingsfíggjarlógini, meðan hetta uppskotið til fíggjarætlan fyri landsmiðstøðina er sett undir § 14 Undirvísingarmál. Ætlanin er framvegis, at landsmiðstøðin skal virka beinleiðis undir Landsskúlafyrisitingini, men um koutoin hjá Landsskúlafyrisitingini varð hækkað við upphæddini til landsmiðstøðina verður mett, at tað hevði verið torført at funnið út av, hvat var hvat í framtíðini, og er tað tí gjørt á henda hátt. Viðmerkjast kann, at eftir álitinum vóru starvsfólk og aðrar fyrisitingarligar útreiðslur ætlaðar at vera saman við Landsskúlafyrisitingini, meðan søvnini vóru á § 14.

*Viðmerkingar til tær einstøku konti*

Øll tøl fyri fíggjarárið 1984/85 eru roknað við støði í, at miðstøðin byrjar 1. august 1984 og er sostatt ¼ av fíggjarárinum farið tá.

*Ad 103048 Løn/tænastumenn*

Eftir uppskotinum til kunngerð verður settur ein leiðari av landsmiðstøðini. Eftir uppskotinum her verður roknað við, at leiðarin verður lærari við skúlabókasavnsútbúgving, og verður hesin ætlandi løntur í lønarrammu 27 í læraralønarlógini. Sostatt verður leiðarin løntur av læraralønarkontoini, harav ríkiskassin skal gjalda 55%. Seinni verður helst neyðugt við konsulenthjálp frá lærarum, og er hendan útreiðslan tikin við í fíggjarmeting fyri 1986/87.

*Ad 103143 Løn/starvsfólk*

Tað verður, beinanvegin landsmiðstøðin fer undir virki sítt, neyðugt við einum skrivstovufólki og einum fólki við bókasavnsútbúgving. Væntandi verður tað so hvørt, sum miðstøðin verður útbygd, neyðugt við fleiri skrivstovufólkum, og tí er eitt afturat sett í metingina fyri 1986/87.

*Ad 103222 Løn/reingerð*

Útreiðslur til reingerð eru settar til kr. 48,75 tús. og er hølið sett til 250 $m^2$.

*Ad 103405 Úrtíðarlønir*

Tað er torført at meta um støddina á hesi konto, men verður mett, at ein ávis upphædd eigur at verða sett av.

*Ad 113202 Ferða- og dagpeningur*

Landsmiðstøðin skal vera ráðgevari hjá skúlabókasøvnunum kring landið, og má ti metast, at nakað av ferðing verður.

*Ad 203204 Prenting*

Roknast má við, at Landsmiðstøðin við tað, at hon eisini skal framleiða tilfar, fær rættiliga stórar útreiðslur til prenting.

*Ad 213806 Leiguútreiðslur*

Tað verður roknað við, at landsmiðstøðin, tá hon er fult útbygd, kemur at hava ein hølistørv uppá 250 til 300 $m^2$, og kostar hetta eftir dagsprísum kr. 46 pr. $m^2$. Upphæddin, sum er sett her, svarar til 300 $m^2$. Møguliga er møguleiki fyri at leiga frá Svend Krosstein, sama stað sum Landsskúlafyrisitingin hevur leigað, og er hvør sektión har 146 $m^2$ til støddar.

*Ad 233051 Innbúgv*

Neyðugt verður við skrivstovuinnbúgvi, sum í fyrstu syftu er sett til at kosta kr. 55.000, í komandi árum kr. 27.500.

*Ad 233409 Leiga av maskinum*

Tað verður her hugsað um kopimaskinu. Seinni verður neyðugt við øðrum maskinum, annaðhvørt at leiga ella at keypa og tá á konto 233561.

*Ad 253085 Bókakeyp og innbinding*

Í álitinum verður roknað við, at árliga útreiðslan til søvn verður kr. 550.000, og hevur Landsskúlafyrisitingin, við vanligum prísvøkstri í huga, sett upphæddina til kr. 715.000 fyrsta árið og hækkað tað nakað fyri komandi ár, til miðstøðin er fult útbygd. Havast skal í huga, at miðstøðin eisini umfatar AV-tól, sum eru dýr at keypa.

*Ad 14604 Kvøldskúlar*

Í summar kom nýggj lóg um frítíðarundirvísing í gildi, løgtingslóg nr. 70 frá 30. juni 1983, og fór samstundis úr gildi kunngerð nr. 9 frá 22. januar 1931 um ríkisstuðning til ungdóms- og kvøldskúlan í Føroyum, sbr. kunngerð nr. 276 frá 7. oktober 1935.

Eftir higartil galdandi reglum, hava ríkis- og landskassin goldið 70% av læraralønunum og neyðugum flutningi av lærarum. Av hesum hevur ríkiskassin latið ⅔ og landskassin ⅓, og aðrar rakstrarútreiðslur hevur avvarðandi kommuna goldið.

Nýggja lógin er býtt upp í 3 ymiskar tættir. 1. almenn frítíðarundirvísing, 2. serstøk frítíðarundirvísing og 3. frítíðarvirksemi. Hvat viðvíkur almennari frítíðarundirvísing fáa kommununrnar framyvir 50% í studningi til studningsheimilaðar útreiðslur (lærara- og leiðaraløn), sum verða at býta millum lands- og ríkiskassan. Serstøk frítíðarundirvísing verður øll goldin av lands- og ríkiskassanum, meðan til frítíðarvirksemi kann verða latið upp til 50% í studningi úr lands- og ríkiskassa.

Nýggja lógin hevur heimild í lóg nr. 53 frá 14. februar 1979 um fritidsundervisning m.v. på Færøerne. Henda lóg er enn ikki sett í gildi, við tað at landsstýrið fyrst skal hava samráðingar við undirvísingarmálaráðharran, áðrenn lógin verður sett í gildi.

**Uppskotið til fíggjarlóg fyri 1984/85 er grundað á hesi tøl:**

| **Almenn frítíðarundirvísing** | | **Lands-/ríkiskassin** |
|---|---|---|
| 60.000 tímar | 7.500.000 kr. | 3.750.000 kr. |
| Serstøk frítíðarundirv. | | |
| 5.000 tímar | 625.000 kr. | 625.000 kr. |
| Frítíðarvirksemi | | |
| 20.000 tímar | 1.400.000 kr. | 700.000 kr. |
| Tilsamans | 9.525.000 kr. | 5.075.000 kr. |
| Kommunanna partur | 4.450.000 kr. | |

Býtislutfallið millum ríkiskassa og landskassa er í uppskotinum sett til ⅔ og ⅓ eins og frammanundan, men er tað ikki vist, at hetta verður býtislutfallið í framtíðini, men hava, sum omanfyri nevnt, enn ongar samráðingar verið um málið.

Ætlaða tímatalið er gjørt við støði í tímatalinum árini frammanundan, og er roknað við einum rættiliga stórum vøkstri við at tilboðini nú verða meira fjølbroytt.

Í fíggjarárinum 1982/83 vóru nýttir umleið 40.000 tímar og í inniverandi fíggjarári, 1983/84, er peningur til umleið 58.000 tímar.

| | |
|---|---|
| R.: 82/83 | 4.455 |
| J.: 83/84 | 6.700 |
| U.: 84/85 | 9.525 |

**Skúlin á Trøðni**

Ríkið rindar 75% av útreiðslunum og landið 25%. Landskassans útreiðslur í 3 ára skeiðnum verða í 1000 kr.:

| | |
|---|---|
| R.: 82/83 | 2.409 |
| J.: 83/84 | 2.365 |
| U.: 84/85 | 2.651 |

*Viðmerkingar til konti, hvørs útreiðslur landskassin ikki luttekur í*

**Føroya Læraraskúli**

Allar útreiðslur til læraraskúlan verða goldnar av ríkiskassanum. Tó skal viðmerkjast, at frá fíggjarárinum 1983/84 at rokna, fer ein vaksandi partur av útreiðslunum til prógvtøkur at verða goldin av landsskúlafyrisitingini, konto 233529.

**Landsskúlafyrisitingini at ráða yvir:**
Ríkiskassin rindar 50% av útreiðslunum á hesi konto.
Landskasan partur í 1.000 kr.:

| | | |
|---|---|---|
| R.: | 82/83 | 18 |
| J.: | 83/84 | 26 |
| U.: | 84/85 | 30 |

**Tekniskir skúlar**
Henda konto fevnir um tekniisku skúlarnar í Tórshavn og Klaksvík og somuleiðis um skúlahcimini í hesum støðum.

Undirvísingarmálaráðið, direktoratet for erhvervsuddannelserne, hevur higartil staðið fyri hesum skúlum. Útreiðslurnar til skúlarnar verða býttar sambært reglunum í fyriskipan nr. 518, dagfest 23. september 1977. Ríkið rindar 50% í rakstrarstudningi til lærlingaundirvísingina og kommunurnar 20%. Ríkið rindar 100% í studningi til prøvtøkuundirvísingina.

Av teimum samlaðu útreiðslunum rindar ríkið uml. 85%, kommunurnar uml. 10%. Tað, ið eftir er, uml. 5%, verður fyrst og fremst rindað sum uppihaldsútreiðslur fyri lærlingar.

Landskassin veitir ikki studning til teir teknisku skúlarnar.

**Handilsskúlar**
Hesin skúlin fær studning eftir somu reglum sum teknisku skúlarnir og útreiðslurnar verða býttar á sama hátt.

Landskassin veitir ikki studning til handilsskúlan, men frá 1983 má roknast við, at Landsskúlafyrisitingin skal bera nakað av prøvtøkuútreiðslunum av konto 233529.

**Føroya Maskinskúli**
Ríkiskassin ber allar útreiðslurnar.

**Privatir skúlar**
Teir privatu skúlarnir fáa, sambært fíggjarnevndarinnar avgerð 1952, studning frá ríkinum uppá 85% av læraralønunum. Harumframt veitir Tórshavnar Kommuna eitt minni tilskot. Studningur verður ikki veittur úr Landskassanum.

Aðrar útreiðslur verða goldnar við næmingagjaldi og tilskoti frá privatum.

**Ad konto § 14 - 14901/313128 Ítróttasamband Føroya**

*Sbrt. skriv dagf. 28. oktober 1983:*

**Fíggjarætlan fyri Í.S.F.**

| **INNTØKUR (í 1000 kr.)** | **fyri árini:** | **1984/85** | **1985/86** | **1986/87** |
|---|---|---|---|---|
| Landskassastudningur | | 2.872 | 3.007 | 3.123 |
| Útvarp Føroya | | 60 | 66 | 74 |
| Limagjøld | | 75 | 80 | 85 |
| Aðrar inntøkur | | 75 | 100 | 100 |
| | | 3.082 | 3.253 | 3.382 |
| Fótbóltsamband Føroya | | 375 | 380 | 400 |
| Hondbóltsamband Føroya | | 155 | 170 | 170 |
| Róðrarsamband Føroya | | 11 | 12 | 12 |
| Flogbóltsamband Føroya | | 197 | 200 | 195 |
| Badmintonsamband Føroya | | 0 | 0 | 0 |
| Borðtennissamband Føroya | | 6 | 6 | 7 |
| Svimjisamband Føroya | | 31 | 35 | 49 |
| Føroya Fimleikasamband | | 0 | 0 | 0 |
| Ítróttasamband fyri brekað | | 0 | 0 | 0 |
| Judosamband Føroya | | 6 | 18 | 8 |
| Ungdóms- og menningardeild | | 0 | 0 | 0 |
| **Inntøkur tilsamans** | | **3.863** | **4.074** | **4.223** |

**ÚTREIÐSLUR**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Felagsrakstur | 840 | 825 | 900 |
| Fótbóltsamband Føroya | 741 | 815 | 890 |
| Hondbóltsamband Føroya | 541 | 595 | 650 |
| Róðrarsamband Føroya | 103 | 110 | 120 |
| Flogbóltsamband Føroya | 612 | 660 | 610 |
| Badmintonsamband Føroya | 220 | 240 | 260 |
| Borðtennissamband Føroya | 100 | 110 | 120 |
| Svimjisamband Føroya | 147 | 184 | 171 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Føroya Fimleikasamband .... | 81 | 91 | 101 |
| Ítróttasamband fyri brekað .. | 46 | 31 | 36 |
| Judosamband Føroya ..... | 55 | 103 | 60 |
| Ungdóms- og menningardeild | 115 | 50 | 50 |
| Renta og avdráttir ..... | 262 | 260 | 255 |
| **Útreiðslur tilsamans ....** | **3.863** | **4.074** | **4.223** |

---

Viðmerking landsstýrisins:

Uppskot landsstýrisins er at játta 1.300.000 kr. á konto 14901/313128

**Ad. § 14 - 14953/313351 Næmingastudningur til listafólk**
*Sbrt. skriv:*

Upphæddin 1983/84 var 35.000 kr.

Mælt verður til, at studningurin í 1984/85 verður tann sami, tó dýrtíðarviðgjørdur.

Sama tilmæli er fyri 1985/86 og 86/87.

---

*Viðmerking frá Landsstýrinum:*
Landsstýrið skjýtur upp at játta 35.000 kr. í 1984/85.

**Ad § 14 - 14953/313368 Føroya Skúlasavn**
*Sbrt. skriv dagf. 26. sept. 1983:*

Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1984/85 viðvíkjandi rakstrarstaði 14953/313368 Føroya Skúlasavn.

Skotið verður upp, at studningurin verður kr. 90.000.

Grannskoðaður roknskapur fyri seinasta fíggjarár verður sendur.

Viðvíkjandi ætlan fyri 1985/86 og 1986/87 er at siga, at eftir nýggju lógin fyri fólkaskúlan eigur »Landsmiðstøð fyri undirvísingarambo« at verða sett á stovn, og tá einaferð verður farið undir hetta, verður talan um væl størri upphæddir.

Føroya Skúlasavn eigur at halda fram við virksemi sínum, til landsmiðstøðin er sett á stovn.

Høligsviðurskifti o.a. gera, at hetta virksemi kann ikki vaksa nakað munandi, og eg kundi tí sum eina leysa ætlan fyri 1985/86 sett kr. 100.000 og fyri 1986/87 kr. 110.000.

**Ad. konto § 14 - 14953/313368:**
*Sbrt. skriv dagf. 28. oktober 1983 frá nevndini fyri Føroya Skúlasavn:*

Nevndin fyri Føroya Skúlasavn heitir á Landsstýrið um at fáa Landsmiðstøðina fyri undirvísingaramboð við á fíggjarlógina 1984/85, smb. tað uppskot, sum Landsskúlafyrisitingin hevur gjørt.

Eftir § 25, 4. stk. í løgtingslóg um fólkaskúlan eigur ein landsmiðstøð fyri undirvísingarverkið at setast á stovn. Avtala er gjørd millum Føroya Skúlasavn og Landsskúlafyrisitingina um, at landsmiðstøðin yvirtekur ognir skúlasavnsins, tá hóskandi høli verða fingin.

Kunngerðin um landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð fyriliggur og vantar nú bara, at hon verður lýst.

Í framtíðarskúlanum, um hann skal virka eftir fólkaskúlalógini, verður ógjørligt at arbeiða uttan skúlabókasøvn, og fyri at hesi kunnu virka eftir ætlan, má ein miðstøð fyri undirvísingaramboð vera.

Eisini skal álvarsliga minnast á, at ein sparing liggur í at savna dýrt tilfar á eini miðstøð, í staðin fyri at hvør skúli sær ognar sær sama tilfar. Møguleiki verður fyri, at gera royndir og at hava skeið á miðstøðini, nakað sum føroyski skúlin harðliga hevur brúk fyri.

**Ad. § 14 - 14553/313384 Norrøna Felagið**
*Sbrt. skriv dagf. 30. september 1983:*

Studningurin til Norrøna Felagið í Føroyum er fyri fíggjarárið 1983/84 kr. 25.000,-. Søkt verður um, at hann í fíggjarárinum 1984/85 verður hækkaður til *kr. 35.000,-*.

Rakstrarætlan felagsins fyri 1984/85 sær soleiðis ut:

**Inntøkur**

| | |
|---|---|
| Limagjald | kr. 22.000,- |
| Væntaður stud. frá landsstýrinum | kr. 35.000,- |
| Annar stuðul | kr. 10.000,- |
| | kr. 67.000,- |

**Útreiðslur**

| | | |
|---|---|---|
| Skrivstovuhald | kr. 15.000,- | |
| Skrivaraløn | kr. 12.000,- | |
| Gjald til meginfelagið, Föreningarna Nordens Förbund | kr. 3.000,- | |
| Limablaðið og árbókin | kr. 10.000,- | |
| Fundarútreiðslur | kr. 3.000,- | |
| Ferðaútreiðslur | kr. 24.000,- | |
| | | kr. 67.000,- |

*Viðmerkingar:*
Roynt hevur verið og verður at gera rakstur felagsins so ódýran, sum a nakran hátt ber til. Ein stór útreiðsla, men avgjørt neyðug, er ferðakostnaður. Meginfelagið — Föreningarna Nordens Förbund — hevur fast árliga 4 stýrisfundir, har formenn og stjórar/skrivarar í hvørjum landi sær luttaka. Har umframt eru árliga 6 stjóra/skrivarafundir. Vit halda okkum ikki hava fíggjarliga orku ella møguleika at luttaka í meiri enn lítlari helvt av hesum fundum t.e. tveimum ella trimum tunglum árliga, har formaður og/ella skrivari umboðar felagið. Hetta økir um skrivstovuútreiðslur, men minkar meira um ferðaútreiðslurnar.

Við vón um vælvild.

---

Roknskapurin 1982 til skjals á Landsskrivstovum

---

*Sbrt. skriv dagf. 10. oktober 1983:*

*Viðvíkjandi fíggjarløgtingslógini 1984/85*

Økt samvinna við Ísland.
Skeið fyri íslendskum lærarum í Føroyum í juni 1984 (10 dagar
Evni: Føroyskt mál og føroyska samfelagið.
Luttakarar: 20 lærarar.

**Kostnaðarætlan**

| | | | |
|---|---|---|---|
| ÚTREIÐSLUR: | Ferðaseðlar: 20 × 3.000 ..... | kr. | 60.000 |
| | Vistarhald: 20 × 100 × 10 ..... | | 20.000 |
| | Skeiðleiðsla: 10 × 500 ..... | | 5.000 |
| | Samsýning til fyrilesarar: 20 × 300 | | 6.000 |
| | Fyrisiting, prent, pappír o.t. ..... | | 4.000 |
| | Ferðir innanoyggja, atgongugjald, ómaksløn til fólk um bygdirnar o.a. 20 × 1000 ..... | | 20.000 |
| | Samanfating - íroknað hugnakvøld: | | 15.000 |
| | | | kr. 130.000 |
| INNTØKUR: | Skeiðluttakarar - ferðagjald: 20 × 3.000 ..... | kr. | 60.000 |
| | Luttøkugjald: 20 × 1.500..... | | 30.000 |
| | Stuðul frá føroyskum lærarafólkum (innivist, matur o.a.): ..... | | 20.000 |
| | Væntandi stuðul frá Føroya Landsstýri ..... | | 20.000 |
| | | | kr. 130.000 |

Tær *20.000 kr.*, ið Norrøna Felagið hervið søkir um, eru hildnar uttan fyri umsóknina um studning til felagið annars, tí hetta verður roknað sum serstøk útreiðsla. Á seinastu fíggjarlóg fekk felagið 20.000 kr. at lata í studningi til føroyskar lærarar, ið vóru á skeiði í Íslandi 3.-10. august í ár. Hetta var sera væl eydnað, og her er nú talan um framhald av hesum arbeiði.

Ætlanir okkara eru áður sendar landsstýri og løgtingi. Uppgáva Norrøna Felagsins er fyrst og fremst at koma við hugskotum og gera fyrstu royndir. Tá ið skeiðið í summar er av, skuldi hol verið gjørt í sjógvin á hesum øki — og farast kann undir aðrar tættir — m.a. skúlabarnaferðir Íslands og Føroya millum.

*Viðmerking landsstýrisins:*
Landsstýrið skjýtur upp at játta 30.000 kr.

**Ad § 14 - 14953/313439: Landsskúlafyrisitingini at ráða yvir: Eftirútbúgving av handverkarum.**

*Sbrt. skriv dagf. 3. oktober 1983 frá Landsskúlafyrisitingini:*

Mælt verður landsstýrinum til, eins og á núgaldandi fíggjarlóg, at seta 200.000,00 kr. av á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1984/85, grein 14, rakstrarstsað 14953 konto 313439, til eftirútbúgving av handverkarum, og at Landsskúlafyrisitingini verður heimilað at umsita hesa upphædd.

*Sbrt. skriv dagf. 23. nov. 1983:*

Vísandi til skriv hiðani, dagfest 3. oktober 1983, og sum uppískoyti til hetta skriv, verður við hesum heitt á Landsstýrið um at hækka umsøktu upphæddina til eftirútbúgving av handverkarum komandi fíggjarár við 100.000,00 kr., frá 200.000,00 kr. til 300.000,00 kr.

Hetta verður gjørt við teirri grundgeving, at tørvurin fyri eftirútbúgving av handverkarum er vaksandi, og eru innkomnar fleiri umsóknir enn kanska upprunaliga væntað.

*Viðmerking landsstýrisins:*
Landsstýrið skjýtur upp at veita 300.000 kr. í 1984/85.

**Ad. § 14 - 14953/313455 U.L.F. og Landsfelag Føroyinga í Útbúgving:**

*Sbrt. skriv dagf. 1. sept. 1983 frá Ungdómslandsfelag Føroya:*

Landsfelag Føroyinga í Útbúgving heitti í fjør, saman við Ungdómslandsfelag Føroya, á Føroya Landsstýri um at seta 260.000 kr. á fíggjarlógaruppskot landsstýrisins til frama fyri rakstur av ungdómsráðstovu í Føroyum.

Feløgini frættu seinni at peningur ikki kundi játtast av teirri orsøk, at umsóknin var landsstýrinum ov seint í hendi. Heitt verður tí í góðari tíð á landsstýrið um at seta 260.000 kr. av í fíggjarlógaruppskoti landsstýrisins fyri 1983/84*). Samstundis verður heitt á landsstýrið um skjótast gjørligt at játta pening soleiðis, at fyritreikingar kundu verið gjørdar og ungdómsráðstovan so smátt kundi farið at virka áðrenn 1. apríl 1984.

Sum áður fráboðað landsstýrinum, hevur Jólamerkjagrunnurin sett sum treyt fyri íløgustuðli, at raksturin fyrst er tryggjaður.

Um endamál og innihald ungdómsráðstovunnar verður víst til fylgjandi skriv, ið áður eru send landsstýrinum:

1) Umsókn til Jólamerkjagrunnin um íløgustuðul.
2) Umsókn til Tipsmiðlarnar um íløgustuðul.
3) Rakstrarætlan fyri Ungdómsráðstovuna.
4) Skriv til landsstýrið dagf. 14.11.82.

*) Má meinast við 1984/85. (Landsskr.)

---

*Sbrt. skriv dagf. 15. oktober 1983:*

Ungdómslandsfelag Føroyar og
postsmoga 2040
3800 Argir, Tórshavn

Landsfelag Føroyinga í Útbúgving
postsmoga 2007
3800 Argir, Tórshavn

Viðvíkjandi: *Umsókn felaganna um at koma á fíggjarløgtingslógina 83-84 og nú 84-85.*

Sum landsstýrinum kunnugt hava Ungdómslandsfelag Føroya og Landsfelag Føroyinga í Útbúgving fyrr heitt á landsstýrið, um at avseta pening til rakstur av eini Ungdómsráðstovu.

Av tí at peningur ikki var avsettur á fíggjarløgtingslógina fyri 1983-84, og av tí at feløgini meta tað vera sera umráðandi, at arbeiði teirra verður stuðlað, eru feløgini samd um at royna nýggjar leiðir fíggjarárið 1984/85.

Av serligum týdningi í hesum sambandi er, at feløgini hava avgjørt at tey í ár, hvørt sær skulu heita á landsstýrið um at fáa pening avsettan. Feløgini fara sjálvandi framyvir at arbeiða fyri góðum samstarvi felaganna millum, men heita samstundis á landsstýrið um at viðgera tær umsóknir, ið feløgini handa landsstýrinum sum sjálvstøðugar umsóknir uttan fíggjarligt tilknýti.

Við vón um at landsstýrið skilir støðu felaganna, heita feløgini á landsstýrið um at geva umsóknunum hjá báðum feløgunum eina positiva viðgerð.

*Sbrt. skriv dagf. 5. okt. 1983 frá L.F.Ú.:*

Landsfelag Føroyinga í Útbúgving heitir hervið á landsstýrið um at avseta peniug í fíggjarlógaruppskotinum fyri 1984/85 til L.F.Ú.

Felagið hevur fyrr, í brævi dagfest 1.9.83, heitti á landsstýrið um at avseta pening til eina Ungdómsráðstovu, men av tí at raksturin av Ungdómsráðstovuni verður sera kostnaðarmikil og tí verður tungur at fíggja, heitir felagið á landsstýrið um at avseta pening smb. viðløgdu rakstrarætlan.

Sum viðlagdi rakstrarroknskapur felagsins vísir, er ikki grundarlag fyri rakstrarætlanini í limagjaldi felagsins eina. Limagjaldið komandi ár er mett til u.l. 14.500,- kr.

Umframt at felagið heitir á landsstýrið um at avseta pening til endamálið, er felagið farið undir fyrireiking av lutaseðlasølu, ið ætlað er at geva felagnum u.l. 40.000,- kr. netto.

Íløguútreiðslurnar í samband við stovnsetanina av skrivstovuni, sum mettar eru til 90.000,- kr., átekur felagið sær sjálvt at søkja fígging m.a. úr Jólamerkjagrunninum.

Við vón um eina positiva viðgerð.

*Íløguætlan* í samband við stovnsetan av skrivstovu, sum hevur til endamáls:

At veita føroyskum ungdómi upplýsandi, ráðgevandi og umsitingarligar tænastur.

| | | |
|---|---|---|
| 2 stk. | skrivaraborð við skuffum og skrivimaskinuborði ..... | 10.680,- kr. |
| 2 stk. | skrivaraborðstólar ..... | 1.900,- kr. |
| 1 stk. | fundarborð til 12 persónar ..... | 6.600,- kr. |
| 12 stk. | stólar til fundarborð..... | 11.210,- kr. |
| 2 stk. | skrivstovuskáp við hillum .. | 11.010,- kr. |
| 1 stk. | brandskáp ..... | 3.290,- kr. |
| 2 stk. | arkivskáp ..... | 7.650,- kr. |
| 2 stk. | roknimaskinur | 3.050,- kr. |
| 2 stk. | skrivimaskinur | 8.500,- kr. |
| 1 stk. | heftimaskina ..... | 2.900,- kr. |
| 1 stk. | spiralinnbindingarmaskina | 10.860,- kr |

| | | |
|---|---|---|
| 1 stk. | ljósborð ..... | * 6.350,- kr. |
| | bøkur og upplýsandi tilfar ..... | 1.000,- kr. |
| | lampur, pappírskurvar, klips, holarar, pappír brævordnarar, undirlag og onnur smáting .... | 5.000,- kr. |
| tilsamans ..... | | 90.000,- kr. |

*Umsókn*

Ungdómsandsfelag Føroya fer nú inn í annað árið sum felag við vaksandi arbeiðsøkjum.

Í hesum sambandi hevur U.L.F. gjørt eina fíggjarætlan, sí viðløgdu skjøl, sum fevnir um ætlandi virki felagsins í 84/85.

Ungdómslandsfelag Føroya heitir tí í hesum sambandi á Føroya Landsstýri um at vísa vælvild og játta

*Kr. 95.500,00*

sum er rakstrarhall felagsins í 1984/85, í studningi á Løgtingsins fíggjarlóg.

**FÍGGJARÆTLAN**
**fyri**
**UNGDÓMSLANDSFELAG FØROYA**
**1984/1985**

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| 1. Limagjald ..... | | 20.400,00 |
| 2. Skrivstova ..... | 51.500,00 | |
| 3. Skeiðviksemi ..... | 29.400,00 | 7.000,00 |
| 4. Ráðgevandi virksemi .... | 15.000,00 | |
| 5. Norðurlendskt samstarv | 17.000,00 | |
| 6. Landstiltøk ..... | 40.000,00 | 30.000,00 |
| 7. Skipannarligt virksemi ... | 26.000,00 | 25.000,00 |
| 8. Rakstrarhall ..... | | 95.500,00 |
| 9. Javnvág ..... | 178.900,00 | 178.900,00 |

Skjølini eru til skjals á landsskrivstovuni.

*Viðmerking frá landsstýrinum:*
Játtaðar verða 200.000 kr. til ungdómsfeløgini.

**Ad § 15 — 15109 Føroya Landsbókasavn**

*Sbrt. skriv dagf. 6. oktober 1983:*

Niðan fyri standandi uppskot til fíggjarætlan hjá Føroya Landsbókasavni fyri 1984/85 verður við hesum sent Landsstýrinum við viðmerkingum og neyðturviligum upplýsingum, somuleiðis ein ætlan fyri 1985/86 og 1986/87.

## 15109 Føroya Landsbókasavn

| Kontonummar og -navn | | Roknskapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/86 | Uppskot landsstýris. 1985/86 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103048 | Løn/Tænastumenn | 193.2 | 198.9 | 200.9 | 200.9 | 200.9 | 200.9 |
| 103143 | Løn/starvsfólk | 948.0 | 1.152.8 | 1.180.8 | 1.110.6 | 1.110.6 | 1.110.6 |
| 103168 | Løn/sáttmálalønt | 213.3 | 235.0 | 252.1 | 252.1 | 252.1 | 252.1 |
| 103222 | Løn/reingerð | 77.0 | 96.2 | 104.8 | 104.8 | 104.8 | 104.8 |
| 103288 | Løn/onnur | 75.9 | 44.0 | 117.0 | 117.0 | 117.0 | 117.0 |
| 113202 | Ferða- og dagpen. innanl. | 0 | 1.0 | 1.2 | 1.2 | 1.2 | 1.2 |
| 113243 | Ferða- og dagpen. uttanl. | 0 | 6.0 | 7.8 | 0.0 | 0.0 | 0.0 |
| 133053 | Fólkatrygging | 0.1 | 4.0 | 4.0 | 4.0 | 4.0 | 4.0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 143.9 | 204.0 | 211.4 | 211.4 | 211.4 | 211.4 |
| 213503 | Umsiting | 14.6 | 18.0 | 30.0 | 30.0 | 30.0 | 30.0 |
| 213702 | Ognartrygging | 23.0 | 26.0 | 26.0 | 26.0 | 26.0 | 26.0 |
| 223404 | Flutningur | 8.0 | 8.0 | 9.0 | 9.0 | 9.0 | 9.0 |
| 233051 | Innbúgv | 45.4 | 35.0 | 40.0 | 40.0 | 40.0 | 40.0 |
| 233155 | Prentlutir | 17.0 | 16.0 | 18.0 | 18.0 | 18.0 | 18.0 |
| 233259 | Postgjald | 16.0 | 13.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 233354 | Telefon og telex | 17.8 | 20.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 |
| 233409 | Leiga av maskinum | 18.1 | 29.8 | 30.0 | 30.0 | 30.0 | 30.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 15.3 | 18.0 | 19.0 | 19.0 | 19.0 | 19.0 |
| 253085 | Bókakeyp og innbinding | 341.2 | 360.0 | 495.5 | 408.0 | 408.0 | 408.0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 9.6 | 6.3 | 6.0 | 6.0 | 6.0 | 6.0 |
| | **Tilsamans** | **2.177.4** | **2.492.0** | **2.798.5** | **2.633.0** | **2.633.0** | **2.633.0** |

*Viðmerkingar:*

**103048 Løn/tænastumenn**
Landsbókavørðurin verður løntur í 31. lønarflokki.

| | |
|---|---|
| Løn juli 1983: 16.079,59 × 12 | 192.9 |
| 4 dýrtíðarviðbøtur á 105 kr. | 5.0 |
| 1,5% frítíðarløn | 3.0 |
| | 200.9 |

**103143 Løn/starvsfólk**
Roknað er við lønini pr. 01.07.1983 + 4 dýrtíðarviðbótum á 105 kr. + 1,5% frítíðarløn.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| a) | 1 fyrsti bókavørður<br>Hevur orlov uttan løn til 1/10-84 | 18. lønarfl. | 4. st | 78.0 |
| b) | 1 bókavørður | 20. lønarfl. | 9. st. (30/42) | 124.0 |
| c) | 1 bókavørður | 15. lønarfl. | 6. st. | 149.8 |
| d) | 1 bókavørður | 15. lønarfl. | 5. st. | 148.0 |
| e) | 1 bókavørður | 15. lønarfl. | 1. st.(½ dag) | 70.3 |

Eftir tilmæli frá Fróðskaparsetur Føroya verður við hesum søkt um hálvt starv til bókavørð at røkja sambandið við »stovnarnar á Debesartrøð« og at samskipa bókakeyp og bókasavustænastu til hesar stovnar.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| f) | 1 skrivari | 12. lønarfl. | 4. st. (37/42) | 119.8 |
| g) | 1 hjálparfólk | 15. lønarfl. | 7. st. (37/42) | 134.1 |
| h) | 1 hjálparfólk | 9. lønarfl. | 14. st. | 142.4 |
| i) | 1 hjálparfólk | 9. lønarfl. | 13. st. | 140.6 |
| j) | 1 bókbind./konservator | 15. lønarfl. | (½ dag) | 73.8 |

Starvið er normerað, men ikki lýst enn.

1.180.8

*103168 Løn/sáttmálaløn*
Vísindabókavørðurin er løntur eftir sáttmála við donsku Magisterforeningen. Løn juli 1983: 19.714

| | |
|---|---|
| + 1,5% frítíðarløn | 240.1 |
| Mett lønarhækking | 12.0 |
| | 252.1 |

*103222 Løn/reingerð*

| | |
|---|---|
| 2 fólk á 60 t. á 54,19 kr. = 6.502,80 kr. um mánaðin | 78.0 |
| 9,5% frítíðarløn | 7.5 |
| Mett lønarhækking | 4.3 |
| Høvuðsreingerð, avloysarar, vindeygavask | 15.0 |
| | 104.8 |

*103288 Løn onnur*

Vegna orlov hjá starvsfólki hevur verið neyðugt við fleiri avloysarum enn roknað var við. Fyrsti bókavørðurin hevur játtaða orlov til 1. oktober 1984. Tann soleiðis sparda lønin í ½ ár verður í staðin løgd afturat her til avloysara.

| | |
|---|---|
| Avloysarar og frítíðarloysarar (78.0+16.0) | 94.0 |
| Húsavørður | 9.6 |
| Urtagarðs- og annað bønarmannsarbeiði | 13.4 |
| | 117.0 |

*213105 El, hiti og vask*

| | |
|---|---|
| Streymnýtsla 70.000 kwt á 1,08 kr. | 75.6 |
| kw gjald | 1.0 |
| Ljósrør v.m. | 6.0 |
| Olja: 32.000 l á 3,75 kr. | 120.0 |
| Eftirlit við hitaverki og ljósi | 1.8 |
| Vask | 7.0 |
| | 211.4 |

*233051 Innbúgv*

Farast má undir at fáa til vega tær í byggiætlanini nevndu kompakt-reólir til goymsluna. Fyrsta stigið verður tikið í ár.

| | |
|---|---|
| Roknað til 2. stigið komandi ár | 35.0 |
| Annað innbúgv | 5.0 |
| | 40.0 |

*233354 Telefon og telex*

Nýtslan er nú yvir 2.000 pr. mánað.
Roknað er við 2.000 kr. pr. mánað, sum nýtslan er
+ 25% hækking

| | |
|---|---|
| | 25.0 |

*233409 Leiga av maskinum*

| | |
|---|---|
| Leiga við teljara til xerox-tólið 12×2.500 | 30.0 |

Inntøka av ljóstøkum verður bókað í 233561.

*253085 Bókakeyp og innbinding*

Samstundis sum nøgdin er størri av tí tilfari, sum útvegast skal, eru prísirnir støðugt hækkandi. Í komandi ári verður roknað við umleið 8% hækking í miðal umframt 25% í innflutningsgjaldi av bókum, bløðum, ljóðbókum, avísmikrofilmum, mikrokortum (katalogum) og av tí (størra) partinum, sum innbundin verður uttanlands.

| | |
|---|---|
| Til Føroyadeildina, íroknað myndir, kort, innbinding og keyp av ljóðbondum og plátum | 106.5 |
| Mikrofilming av avísunum (framhald) | 100.0 |
| Føroysk ljóðbókagerð í samstarvi við Grønland og Ísland | 15.5 |
| Útlendskar yrkisbókmentir, handbøkur v.m. | 106.0 |
| Útlendsk periodica | 32.0 |
| Innbinding og konservering | 45.0 |
| | 405.0 |
| + 25% innflutningsgjald av 350.000 kr. | 87.5 |
| Tilsamans | 495.5 |

*Viðmerkingar landsstýrisins:*
Konto 103143 Starvsfólk ½ bókavørður, 70.300,- kr. ikki játtaður.
Konto 113243 Ferða- og dagpeningur uttanlands.

Landsstýrið hevur avgjørt hereftir at bóka útreiðslur til uttanlandsferðir hjá teimum smærru stovnunum á rakstrarstað 11758. Um stovnurin hevur brúk fyri uttanlandsferðum, verður sum vanligt søkt um farloyvi, og útreiðslurnar verða bókaðar á rakstrarstað 11758 sundurgreinað soleiðis, at møguleiki er fyri at síggja hvussu nógv, hvør stovnur til eina og hvørja tíð hevur nýtt til uttanlandsferðir.

*Konto 253085 Bókakeyp og innbinding*

Innflutningsgjald 87.500 kr. ikki tikið við.

**Ad § 15 - 15202 Fólkabókasøvn**

*Sbrt. skriv dagf. 6. oktober 1983:*

| | | Roknskapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýris. 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 253011 | Umsjón | 721 | 4.0 | 4.0 | 4.0 | 4.0 | 4.0 |
| 253202 | Rithøvundasamsýning | 52.996 | 60.5 | 72.2 | 72.2 | 72.2 | 72.2 |
| 323181 | Bygging og nýstovnan | 300.000 | 850.0 | 625.0 | 625.0 | 625.0 | 625.0 |
| (nýggj) | Bókabiltænasta | — | — | 225.0 | 225.0 | 225.0 | 225.0 |
| 373106 | Rakstrartilskot | 1.898.408 | 2.417.5 | 2.884.8 | 2.687.8 | 2.687.8 | 2.687.8 |
| | **Tilsamans** | **2.252.125** | **3.332.0** | **3.811.0** | **3.614.0** | **3.614.0** | **3.614.0** |

*253011 Umsjón*
Landsbókasavninum er álagt at hava umsjón við fólkabókasøvnunum — óbroytt ætlan fyri komandi 2 fíggjarárini.

*253202 Rithøvundasamsýning*
Upphæddin er við lóg ásett at svara til 2,5% av játtanini til fólkabóka søvnini (konto 373106). Í 1982/83 vóru 60 rithøvundar, sum skriva á føroyskum, umboðaðir í foll.abókasøvnunum við 5.364 bókum. Gjaldið pr. bók var 9,88 kr. Játtanin í 1983/84 verður býtt í mars 1984 ímillum 64 rithøvundar við 5.846 bókum ella umleið 10,35 kr. pr. bók.

*323181 Bygging og nýstovnan*
Fyrsta byggistigið hjá Fuglafjarðar bókasavni verður liðugt í 1983/84 Av samlaða byggikostnaðinum upp á 3 mió. kr. er roknað við 1,7 mió. í 1984 og 1 mió. í 1985. Lógásetti studningurin er 50% av kostnaðinum. Til hini bókasøvnini verður roknað við 1,7 mió. í 1984 og 1 mió. í 1985. Lógásetti studningurin er 50% av kostnaðinum. Til hini bókasøvnini verður roknað við 2×30.000 kr. Farið verður ikki undir fráboðaðu byggingina í Klaksvík fyribils. Somuleiðis er óvist hvussu verður við bygging av Býarbokasavni í Havn. Málið verður fyrircikað, men er ikki endaliga samtykt.

*Nýtt kontonr. Bókabilatænasta*
35 kommunur við fjórðinginum av landsins íbúgvum eru uttan beinleiðis bókasavnstænastu, og tey fáu bókasøvnini úti á bygd eru yvirhøvur ov smá og ótíðarhóskandi. Neyðugt verður við einari munabetri bókasavnstænastu fyri so mong sum gjørligt. Í staðin fyri at stovna smá sjálvstøðug fólkalbókasøvn í hvørjari bygdakommunu, verður skotið upp, at skúlabókasøvnini, sum lógin krevur við skúlarnar, eisini røkja fólkabókasavnsuppgavur, møguliga í sambandi við eina bókabiltænastu út frá Landsbókasavninum.

Bókabilurin hevur allastaðni royndst bíligari og betri bókasavnstænasta til smáplássini enn parttíðarbókasøvnini, sum flest alla staðni verða løgd niður, og bókabilur settur inn í staðin. Í fyrstu syftu verður ikki skotið upp at leggja niður verandi bókasøvn, men heldur samskipa og útbyggja tey mest møguligt og annars viðgerða støðu teirra í tí nevnd, sum skal endurskoða bókasavnslóggávuna alla.

Bókabilatænasta er vanliga ein kommunal uppgáva eins og onnur fólkabókasavnstænasta. Men í tí greiniliga uppskotinum, sum fyrsta dagin verður sent landsstýrinum, verður skotið upp at gera eina royndar-

skipan við bókabili fyribils við landskassans rokning sum eitt ókeypis tilboð til 21 meira og minni bókasavnsleysu kommunurnar í Eysturoynni og Streymoynni í fyrstu syftu.

Nýggjur fult útgjørdur bókabussur kostar at keypa millum 400.000 og góða miljón kr. Skotið verður upp í staðin at leiga hóskandi buss og seta í hann útskiftiligar reólir og aðra neyðuga útgerð.

| | | |
|---|---|---|
| Til reólir og útgerð verður íløgan fyrsta árið | | 60.000 kr |
| Rakstrarútreiðslurnar verða: | | |
| Leiga av bili 7×8.000 kr. | 56.000 kr. | |
| Koyriútreiðslur 3.500 l á 3,00 kr | 10.500 kr. | |
| Løn til bilstjóra í 7 mánaðar | 83.900 kr | |
| Telefon og aðrar útreiðslur | 3.600 kr. | 154.000 kr |
| Tilsamans við íløguni fyrsta árið | | 214.000 kr |

Roknað verður við, at ein við Landsbókasavnið settur bókavørður tekur sær av bókabiltænastuni. Sostatt verða ikki eyka lønarútreiðslur í hesum sambandi.

Neyðugt verður ikki við stórvegis eyka bókakeypi til biltænastuna fyrsta royndarárið (uml. 15. sept. 1984 til 1. mei 1985).

*373106 Rakstrarstudningur*

Landskassastudningurin er 60% av rakstrarútreiðslunum árið fyri. Yvirlitið niðanfyri er sett upp eftir fíggjaretlanini hjá hvørjum savninum sær, har hon hevur fingist.

Søvnini a, c, d, i og j hava ikki søkt um studning í 1983/84.

— Skúlabókasøvn fáa ikki studning eftir lógini um fólkaskúlasøvn, utan at tey eisini røkja fólkabókasavnsuppgávur.

| | Ætlaður rakstur 1983/84 | Studningur 1984/85 |
|---|---|---|
| a. Bókasavnið í Nes kommunu | 30.000* | 18.000 |
| b. Býarbókasavnið, Tórshavn | 3.183.000 | 1.909.800 |
| c. Eiðis bókasavn | 10.000* | 6.000 |
| d. Fuglafjarðar bókasavn | 317.000 | 190.200 |
| e. Glyvra bókasavn | 64.000 | 38.400 |
| f. Klaksvíkar bókasavn | 453.000 | 277.800 |
| g. Kollafjarðar bókasavu | 67.000 | 40.200 |
| h. Leirvíkar bókasavn | 60.000** | 36.000 |
| i. Sandavágs-Miðvágs bókasavn, Giljanes | 35.000* | 21.000 |
| j. Sandoyar bókasavn, Sandi | 25.000* | 15.000 |
| k. Sunda bókasavn, Oyri | 9.000 | 5.400 |
| l. Sørvágs bókasavn | 42.000 | 25.200 |
| m. Tvøroyrar bókasavn | 55.000 | 33.000 |
| n. Vágs bókasavn | 60.000 | 36.000 |
| o. Vestmanna bókasavn | 60.000 | 36.000 |
| | 4.480.000 | 2.688.000 |
| Bókakeyp og blaðhald: 1.312.800 kr. 25% tollur. | 328.200 | 196.800 |
| **Tilsamans** | **4.808.200** | **2.884.800** |

* eingin fíggjarætlan komin 1. oktober 1983.
** savnið ikki byrjað og eingin fíggjarætlan fingin.

---

*Viðmerking frá landsstýrinum:*
Tikin er hædd fyri, at tollur ikki er komin upp á bøkur.

**Ad § 15 - 15304 Føroya Landsskjalasavn**
*Sbrt. skriv dagf. 30. september 1983:*

Hervið verður sent landsstýrinum fíggjarlógaruppskot 1984/85 fyri Føroya Landsskjalasavn.

| Kontonummar og navn<br>Rakstrarstað 15304 | | Roknskapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýris. 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103143 | Løn-starvsfólk | 349.1 | 500.0 | 682.5 | 541.5 | 541.5 | 541.5 |
| 103168 | Løn-sáttm. | 238.3 | 239.0 | 239.0 | 239.0 | 239.0 | 239.0 |
| 113202 | Ferða- og dagp. innanl. | 21.0 | 25.0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 |
| 113243 | Ferða- og dagp. uttanl. | — | 0.0 | 15.0 | 0.0 | 0.0 | 0.0 |
| 113105 | El, hiti og vask | 4.3 | 0 | 60.0 | 60.0 | 60.0 | 60.0 |
| 213408 | Umvælingar | 0.0 | 10.0 | 130.0 | 130.0 | 10.0 | 10.0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 0.0 | 50.0 | 110.5 | 110.5 | 110.5 | 110.5 |
| 233050 | Innbúgv | 40.0 | 45.0 | 65.0 | 65.0 | 25.0 | 25.0 |
| 233155 | Prentlutir | 0.20 | 18.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 233259 | Postgjald | 1.2 | 2.0 | 2.0 | 2.0 | 2.0 | 2.0 |
| 233354 | Telefon | 19.5 | 14.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútr. | 24.5 | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 253085 | Bókakeyp v.m. | 0.5 | 3.0 | 3.0 | 3.0 | 3.0 | 3.0 |
| 253505 | Konservering | 34.7 | 10.0 | 50.0 | 50.0 | 50.0 | 50.0 |
| 253521 | Flyting skjalasøvn v.m. | 0.0 | 5.0 | 5.0 | 5.0 | 0.0 | 0.0 |
| 253538 | Pakkitilfar v.m. | 0.0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 |
| 253546 | Útgáva, keldur | 0.0 | 10.0 | 50.0 | 50.0 | 10.0 | 10.0 |
| 253554 | Skráseting | 0.0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 |
| 253562 | Vísindaligar kanningar | 0.0 | 22.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 |
| | **Tilsamans** | **733.3** | **988.0** | **1.522.0** | **1.366.0** | **1.161.0** | **1.161.0** |

*Ad. konto 103143 Løn starvsfólk*
Umframt at goyma skjøl frá umleið ár 1600 til umleið 1970 hevur landsskjalasavnið skyldu til at granska Føroya søgu. Søkt verður tí um skjalavørð við universitetsútbúgving í søgu.

*Ad. konto 213105 El, hiti, vask*
Hækkingin kemur av, at neyðugt verður at leiga ca. 300 m² av goymsluplássi. Hetta eru tølini, sum útleigarin hevur uppgivið.

*Ad. konto 213408 Umvælingar*
Sum landsstýrinum kunnugt út frá brævaskifti við stovnin, fyriliggur tilboð frá Kramme & Zeuthen um umvæling og umbygging av compactushillum savnsins.

Tilboðið er longt til 1. apríl 1984 við vanligum prís- og lønarhækkingum, tilsamans uml. 130.000 kr.

Sí skriv savnsins 22. juni 1983 og svar landsstyrisins 23 august 1983 j.nr. F.L. 324-7.

*Ad. konto 213806 Leiguútreiðslur*
Sum landsstýrinum kunnugt frá brævaskifti og fundum við landsstýrismannin, eru goymslu- og skrivstovuviðurskifti savnsins út av lagi. Hóskandi goymsluhøli eru nú fingin til vega í Rættará, og landsstýrið hevur góðkent leigusáttmálan.

*Ad. konto 233050 Innbúgv*
Av tí at eingi tynda- og lesitól fæst fyri undir 130.000 kr. so er eingi tofingið til vega enn.

Søkt verður tí um 130.000 kr. í tvey ár t.v.s. 65.000 kr. fyri 83/84.

Orsøkin til at søkt verður um mynda- og lesitól er tann, at tað í longdini ikki ber til at læna original handritini út á lesistovurnar. Í staðin er ætlanin at avfotografera øll týðandi handrit og so bert nýta mikrofilm til vanliga nýtslu.

Í øðrum lagi er ætlanin at mikrofotografera allar týðandi skjalabókar av trygdarorsøkum. Mikrofilmirnir verða so geymdir uttan fyri savnið á deild savnsins í Rættará

*Ad. konto 253546 Útgáva av søguligum keldum*
Í 1984 verður elsta varðveitta jarðarbókin 400 ár.

Hetta handrit er enn í varðveitslu hjá danska ríkisskjalasavninum í Keypmannahavn. Jarðarbókin og lensroknskapirnir, ið hoyra til hennara, eru mest týðandi keldurnar til so at siga allar partar av Føroya søgu og mentasøgu. Soleiðis goyma handritini t.d. upplýsingar um búskaparlig viðurskifti, búskaparsøgu, ættarsøgu eins og tey hava avgerandi týdning fyri fólkanavna- og staðarnavnagransking og málsøgu.

Føroya Landsskjalasavn og Fornminnissavnið ætla í felag at geva handritini út í bók við vísindaligum viðmerkingum, so hetta handrit kann gerast atkomuligt hjá granskarum og almenninginum. Ætlanin er, at bókin skal koma út á vetri 1984.

Útgávan er mett at kosta 150.000 kr., sum vit ætla at býta javnt millum Landsskjalasavnið, Fornminnissavnið og Mentunnargruntin.

*Grunnur*
Í grunn til nýtt skjalasavn: kr. 500.000.
Víst verður til skriv savnsins í samband við fíggjarlógaruppskotið fyri 1983/84 og fundir við landsstýrið um plássviðurskifti savnsins.

*Ad. konto 103143 Løn starvsfólk*
Verandi størv 3 savnshjálparar, ½ hálvur konservatorur, fritíðaravloysari ¼ tíð.

*Ad. konto 103168 Løn sáttmálalønt*
Verandi størv: 1 landsskjalavørður, søkt verður um ein skjalavørð aftrat

---

*Viðmerkingar landsstýrisins:*

Konto 103143 Løn — starvsfólk: 1 skjalavørður ikki játtaður
Konto 113243 Ferða- og dagpeningur uttanlands:

Landsstýrið hevur avgjørt hereftir at bóka útreiðslur til uttanlandsferðir hjá teimum smærru stovnunum á rakstrarstað 11/58. Um [illegible] ur brúk fyri uttanlandsferðum, verður sum vanligt [illegible] útreiðslurnar verða bókaðar á rakstrarstað 11[illegible] is, at møguleiki er fyri at síggja, hvussu nógv, hvør [illegible] hvørja tíð hevur nýtt til uttanlandsferðir.

**Ad. § 15 - 15403 Føroya Fornminnissavn**

*Sbrt. skriv dagf. 10. oktober 1983:*

Hjálagt verður sent Landsstýrinum uppskot til fíggjarlóg fyri fíggjarárið 1984/85 og ætlan fyri fíggjarárini 1985/86 og 1986/87 fyri rakstrarstað 15406 Føroya Fornminnissavn og rakstrarstað 15508 Bygdasøvn v.m.

| kt. | | Roknskapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýris. 1984/85 | Ætlan 1985/86 | Ætlan 1986/87 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103048 | Løn/tænastumenn | 87.263,83 | 90,5 | 94,5 | 94,5 | 94,5 | 94,5 |
| 103143 | Løn/starvsfólk | 657.323,26 | 663,2 | 1.097,6 | 845,7 | 1.097,6 | 1.097,6 |
| 103168 | Løn/sáttmálalønt | 637.498,09 | 852,9 | 895,8 | 895,8 | 895,8 | 895,8 |
| 103222 | Løn/reingerð | 57.322,71 | 58,9 | 92,0 | 92,0 | 92,0 | 92,0 |
| 103288 | Løn/onnur | 653.669,49 | 491,5 | 540,7 | 570,7 | 540,7 | 540,7 |
| 113202 | Ferða- og dagp. innanlands | 70.762,00 | 107,7 | 118,5 | 118,5 | 118,5 | 118,5 |
| 113243 | Ferða- og dagp. uttanlands | 0,00 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| 203905 | Ymisk kommunikatión | 19.708,87 | 30,0 | 33,0 | 33,0 | 33,0 | 33,0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 41.480,89 | 35,7 | 44,3 | 44,3 | 44,3 | 44,3 |
| 213408 | Umvælingar v.m. | 32.810,45 | 137,9 | 41,7 | 41,7 | 41,7 | 41,7 |
| 213207 | Ognartryggingar | 9.570,00 | 29,5 | 23,7 | 23,7 | 23,7 | 23,7 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 54.000,00 | 68,4 | 75,2 | 75,2 | 75,2 | 75,2 |
| 233051 | Innbúgv | 46.125,91 | 64,3 | 70,7 | 70,7 | 70,7 | 70,7 |
| 233259 | Postgjald | 7.906,30 | 8,0 | 8,8 | 8,8 | 8,8 | 8,8 |
| 233354 | Telefon og telex | 21.078,00 | 24,5 | 30,6 | 30,6 | 30,6 | 30,6 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútr. | 18.131,71 | 27,7 | 30,5 | 30,5 | 30,5 | 30,5 |
| 253085 | Bókakeyp og innbinding | 14.879,09 | 17,1 | 18,8 | 18,8 | 18,8 | 18,8 |
| 253115 | Útgrevstur | 19.840,56 | 45,3 | 29,8 | 29,8 | 29,8 | 29,8 |
| 253115 | Umsiting av fornminnum | 81.382,28 | 152,3 | 167,5 | 167,5 | 167,5 | 167,5 |
| 253306 | Amboð | 17.348,99 | 19,0 | 120,9 | 20,9 | 20,9 | 20,9 |
| 253314 | Aðrar umsitingarútr. | 89.956,47 | 95,6 | 105,0 | 105,0 | 105,0 | 105,0 |
| 253322 | Etnologiskar kanningar | 14.520,61 | 19,0 | 20,9 | 20,9 | 20,9 | 20,9 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 4.534,35 | 57,0 | 78,0 | 78,0 | 32,7 | 32,7 |
| | | 2.657.203,86 | 3.088,0 | 3.736,5 | 3.416.6 | 3.593,2 | 3.593,2 |

FØROYA FORNMINNISSAVN
*Rakstrarstað nr. 15406*

*Skjal 1*

## Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1984/85
## útgreinað á deildir/arbeiðsøki

| kt.nr. | deild 1 | 2.1 | 2.2 | 3.1 | 3.2 | 3.3 | 4 | 5 | 6.1 | 6.2 | 6.3 | 7.1 | 7.2 | 8.1 | 8.2 | tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103048 Løn/tænastumenn | | | | | | | | | | | | | | 94.5 | | 94.5 |
| 103143 Løn/starvsfólk | 384.5 | 140.6 | | | | | 149.2 | 133.0 | 149.3 | | | 141.0 | | | | 1.097.6 |
| 103168 Løn/sáttmálalønt | 288.3 | | | 192.3 | | | | | 166.0 | | | 249.2 | | | | 895.8 |
| 103222 Løn/reingerð | 55.7 | | | | 7.9 | | | | | | | | | 28.4 | | 92.0 |
| 103288 Løn/onnur | 67.3 | 6.0 | | | 11.5 | 28.3 | 24.9 | | 20.7 | 82.7 | 142.8 | 20.1 | 51.7 | 62.7 | 22.0 | 540.7 |
| 113202 Ferða- og dagp. innanl. | | 15.4 | | 14.0 | | | | | 26.0 | 17.6 | 17.6 | 20.9 | | 7.0 | | 118.5 |
| 113243 Ferða- og dagp. uttanl. | | | | | | | | | | | | | | | | 0.0 |
| 203905 Ymisk kommunikatión | | | | | | | | | | | | | | 11.0 | 22.0 | 33.0 |
| 213105 El, hiti og vask | 30.6 | | | | 7.2 | | | | | | | | | 6.5 | | 44.3 |
| 213408 Umvælingar v.m. | 41.7 | | | | | | | | | | | | | | | 41.7 |
| 213702 Ognartryggingar | 23.7 | | | | | | | | | | | | | | | 23.7 |
| 213806 Leiguútreiðslur | | | | | | | 75.2 | | | | | | | | | 75.2 |
| 233051 Innbúgv | 6.9 | | | | | | 63.8 | | | | | | | | | 70.7 |
| 233259 Postgjald | 8.8 | | | | | | | | | | | | | | | 8.8 |
| 233354 Telefon og telex | 30.6 | | | | | | | | | | | | | | | 30.6 |
| 233561 Aðrar skrivstovu útr. | 30.5 | | | | | | | | | | | | | | | 30.5 |
| 253085 Bókakeyp og innb. | 1.5 | 2.9 | | 2.9 | | | 1.5 | | 2.9 | | | 5.6 | | 1.5 | | 18.8 |
| 253115 Útgrevstur | | | | | | | | | 15.8 | 6.0 | 6.0 | | | | | 27 8 |
| 253268 Umsiting av fornminnum | | | | 48.7 | 118.8 | | | | | | | | | | | 167.5 |
| 253306 Amboð | | 120.9 | | | | | | | | | | | | | | 120.9 |

506

| | | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **253314 Aðrar umsitingarútr.** | | | | | | 77.0 | 14.0 | 14.0 | | | | | | | | 105.0 |
| **253322 Etnologiskar kanningar** | | | | | | | | | | | | 20.9 | | | | 20.9 |
| **253903 Aðrar útreiðslur** | 8.0 | 60.0 | | | | | | | | | | 10.0 | | | | 78.0 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | 3.736.5 |

1. Fyrisiting
2.1. Fornminnaumsjón
2. — , skráseting
3.1. Bygningaumsjón
2. — , Dúvugarðar
3. — , Skansin
4. Gripasavn
5. Myndasavn
6.1. Fornfrøðilig deild
2. — , rannsókn
3. — , rannsókn
7.1. Fólkalívsdeild
2. — , rannsókn
8.1. Upplýsingardeild
2. — , serframsýning

*Viðmerkingar*

Sum heild byggir fíggjarlógaruppskotið á játtanina í verandi fíggjarári við reguleringum sambært vøkstrinum í prís- og løunargrundarlagnum. Savnið setir tó eisini í sambandi við arbeiðsætlan sína fram nøkur nýggj ynski, sum greitt verður frá í viðmerkingunum til einstøku greinirnar.

Uppskotið er sundurgreinað á deildir/arbeiðsøki í skjali 1.

*ad kt. nr. 103049: løn, tænastumenn*

| | | |
|---|---|---|
| ½ savnslærari 28.4. | | *kr. 94.479* |

*ad kt. nr. 103143: løn, starvsfólk*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Savnsskrivari | 12, 4-5 | kr. 135.521 | |
| assistentur | 9, 7-8 | kr. 130.131 | |
| skrivstovuass./ass. | 7, 6 el. 9, 2 | kr. 118.877 | |
| konservator | 15, 4-5 | kr. 149.162 | |
| savnsteknikari | TF 3, 13-14 | kr. 149.317 | |
| savnsteknikari | TF 3, 8-9 | kr. 140.877 | |
| savnsteknikari | TF 3, 8 | kr. 140.640 | |
| fotografur | | kr. 132.995 | kr. 1.097.519 |

Í sambandi við viðgerðina av uppskoti savnsins um umnormering hendi í fjør tað mistak, at nýggja arkitektstarvið varð fíggjað við eini ársløn bæði av kt. 103143 og kt. 103288. Savnið metir seg tí framvegis at hava 3 normerað størv sum savnsteknikari.

Søkt verður aftur um fotograf at taka sær av stóra savninum við gomlum myndum, sum fornminnissavnið eigur, men lítla og onga nyttu fær gjørt burtur úr, so leingi eingin fotografur er játtaður.

Orsakað av m.a. nógva innsavningararbeiði savnsins, sum fyri stóran part verður gjørt við bandupptøkum, megnar skrivstovan ikki alt skriviarbeiðið, og meir og meir tilfar verður liggjandi óviðgjørt. Savnið søkir tí um eitt skrivstovufólk afturat.

*ad kt. nr. 103168. løn, sáttmálalønt*

| | | | |
|---|---|---|---|
| landsantikvarur | 15. | kr. 288.317 | |
| savnvørður | 13. | kr. 249.246 | |
| savnvørður | 1. | kr. 165.980 | |
| arkitektur | 7. | kr. 192.255 | kr. 895.798 |

Eftirlønargjøld íroknað.

*ad kt. nr. 103222: løn, reingerð*

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Starvshúsini | 780 t. á kr. 58,29 | Kr. 45.466 | | |
| | 70 t. á kr. 76,40 | — 5.348 | | |
| | 9,5% | — 4.828 | Kr. 55.642 | |
| Dúvugarðar | 72 t. á kr. 58.29 | Kr. 4.197 | | |
| | 40 t. á kr. 76,40 | — 3.056 | | |
| | 9,5% | — 639 | Kr. 7.942 | |
| Bókasavnsloftið | 380 t. á kr. 58,29 | Kr. 22.150 | | |
| | 50 t. á kr. 76,40 | — 3.820 | | |
| | 9,5% | — 2.467 | Kr. 28.437 | Kr. 92.020 |

Hækkingarnar standast av munandi hækkaðum krøvum til reinføri, serstakliga á Bókasavnsloftinum og í Dúvugørðum.

*ad kt.nr. 103288: løn, onnur.*

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Fyrisiting: | frítíðargjøld | kr. | 45.000 | |
| | at ráða yvir | - | 22.300 | |
| Fornminnaumsjón: | Kvívík, Tjørnuvík, røkt | - | 6.000 | |
| Bygningaumsjón: | Dúvugarðar, røkt | - | 11.500 | |
| | Skansin, røkt | - | 28.300 | |
| Gripasavn: | Arbeiðshjálp | - | 24.900 | |
| Fornfr. deild: | Ymisk arbeiði | - | 20.700 | |
| | Rannsókn | - | 87.700 | |
| | Rannsókn | - | 142.800 | |
| Fólkalívsdeild: | Arbeiðshjálp | - | 20.100 | |
| | Rannsókn | - | 51.700 | |
| Upplýsingardeild: | Vaktarhald | - | 62.700 | |
| | Serframsýning | - | 22.000 | kr. 540.700 |

Býtið millum arbeiðsøkini kann verða ávirkað av seinri broytingum í arbeiðsætlanini.

*ad kt.nr. 213105: El, hiti og vask.*

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Starvshúsini: | | | | |
| El: 4550 kwt á kr. 1,30 | kr. | 5.915 | | |
| hiti:7.900 l á kr. 2,75 | - | 21.725 | | |
| Vaskievni o.t. | - | 3.000 | kr. | 30.640 |
| Dúvugarðar: | | | | |
| El:15.500 kwt á kr. 1,30 | | | kr. | 7.150 |
| Bókasavnsloftið: | | | | |
| hiti: 2360 l. á kr. 2,75 | | | kr. | 6.490 |
| | | | kr. | 44.280 |

Henda konto hevur tíverri altíð verið undirmett, men rokna vit við, at hon nú fer at halda.

*ad kt.nr. 233354: Telefon.*
Roknað er við 25% hækking.

*ad kt.nr. 253306:Amboð.*
Íroknað uppskotið er kr. 100.000 til keyp av savnsbili, sum stórur tørvur er á til fornminnaumsjón, fornfrøðiligar rannsóknir og innsavningar.

*ad kt.nr. 253903:Aðrar útreiðslur.*

| | | |
|---|---|---|
| Ymsar útreiðslur | kr. | 7.000 |
| Samsýningar | - | 20.000 |
| Útgáva | - | 50.000 |

Víst verður til fíggjarlógaruppskot Landsskjalasavnsins, kt. 253546 viðv. útgávu. Jarðabókin og leinsroknskapirnir eru týdningarmestu skrivaðu keldur til eitt av høvuðsgranskingarevnum Fornminnissavnsins, búsetingar- og garðssøgu. Hesar keldur hava verið nógv nýttar í granskingarvirksemi savnsins, og hevur Fornminnissavnið tí átikið sær munandi part av vísindaligu uppgávunum í sambandi við útgávuna, so verkið verður bæði vísindaligt og fíggjarligt samstarvsprojekt savnanna millum.

---

*Viðmerkingar frá landsstýrinum:*

Játtaður verður ein savnsteknikari kr. 149.317
Fotografur verður ikki játtaður.
Skrivstovuassistentur ikki játtaður.
Bilur ikki játtaður.
30.000 kr. játtaðar til løn til fotografering undir løn/onnur, konto 103288.

Sbrt. skriv:

| Konto | | Reikn-skapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103505 | Samsýningar | - | 8.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 |
| 373106 | Rakstrartilskot | 52.000,00 | 70.0 | 189.6 | 189.6 | 189.6 | 189.6 |
| 373504 | Fornminnisnevnd | - | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 373905 | Umvælingarstudningur | 89.998,08 | 100.0 | 110.0 | 110.0 | 110.0 | 110.0 |
| | Í grunn til gomlu presta-húsini á Nesi | | | | 150.0 | | |
| | | 141.999.08 | 198.0 | 334.6 | 484.6 | 334.6 | 334.6 |

*Viðmerkingar.*

*ad kt.nr. 103509.* Skotið verður upp at hækka samsýningina, sum hevur verið tann sama í mong ár.

*ad kt.nr. 373106: Rakstrartilskot.*
Lógarbundin studningur til bygdasøvn varð tíverri stórliga undirmettur í 1983/84, so játtanin verður ikki at røkka. Fyri fíggjarárið 1984/85 verður studningurin vvæntandi:

| | | |
|---|---|---|
| Miðvágs Bygdasavn | kr. 12.000 | |
| Norðoya Fornminnisavn | _- 177.582 | (samb.fíggjarætlan) |
| | kr. 189.582 | |

Uppskot landsstýrisins til seinastu fíggjarløgtingslóg um at keypa gamla prestagarðin á Nesi verður uppafturtikið. Húsini eru niðurskrivað til 0, men ognin stendur landsstýrinum í boði fyri kr. 100.000 - 150.000.

**Aml § 15 - 15551 Fiskirannsóknarstovan**
***Sbrt. skriv dagf. 3. oktober 1983:***

***Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1984/85.***

| Konto | | Rokn-skapur 1982 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 73057 | Endurgjald ríkið | ÷ 663 | ÷ 770 | ÷ 964 | ÷ 964 | ÷ 964 | ÷ 964 |
| 103143 | Løn starvsfólk | 122 | 300 | 469 | 469 | 469 | 469 |
| 103168 | Løn sáttmálalønt | 1.727 | 1.830 | 1.934 | 1.934 | 1.934 | 1.934 |
| 103288 | Løn onnur | 45 | 30 | 45 | 45 | 45 | 45 |
| 113202 | Ferða- og dagpeningur | 59 | 75 | 75 | 75 | 75 | 75 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 71 | 82 | 82 | 82 | 82 | 82 |
| 233051 | Innbúgv | 16 | 15 | 30 | 30 | 30 | 30 |
| 233155 | Prentlutir | 14 | 23 | 25 | 25 | 25 | 25 |
| 233259 | Postgjøld | 6 | 7 | 10 | 10 | 10 | 10 |
| 233354 | Telefon | 31 | 35 | 50 | 50 | 50 | 50 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 27 | 10 | 30 | 30 | 30 | 30 |
| 253306 | Amboð | 139 | 745 | 175 | 175 | 175 | 175 |
| 253339 | Leiga av førum o.a. | 34 | 250 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| 253363 | m/t Magnus Heinason | 4.733 | 5.895 | 8.075 | 8.075 | 8.075 | 8.075 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 26 | 20 | 25 | 25 | 25 | 25 |
| | | **6.387** | **8.547** | **10.361** | **10.361** | **10.361** | **10.361** |

**Viðmerkingar**

*Konto 103143 Løn til starvsfólk*

Hækkingin stavar frá, at okkum tørvar 1 fólk ½ dag til at lesa nytrar v.m., og 1 fólk ½ dag til passan av telefon, ganga ørindi og annað fyrifallandi arbeiði.

*Konto 253396 Amboð*

Henda upphædd er til service v.m. av datatólum.

*Konto 253363 Magnus Heinason*

Í fíggjarárinum 1983/84 var ein niðurskurður upp á uml. 1 mill kr. Tað var ikki tikin hædd fyri, at báturin fekk spæl-trupulleikar og fór til Noregs at fáa spølini umvæld. Tað var heldur ikki tikin hædd fyri, at báturin skuldi hava 5 ára klassing og harafturat keyp av neyðugum tíðarhóskandi tólum á brúnni.

*Hølisviðurskiftini*

Tað verður einaferð enn mint á, at vit ikki enn hava fingið nakað játtandi svar uppá tey ógvuliga trongu hølisviðurskiftini.

*Rakstrarætlan m/t Magnus Heinason 1984/85:*

| | | |
|---|---|---|
| Hýrur | 4.200 | |
| Olja, íroknað studning | 3.900 | |
| Tryging | 650 | |
| Vanlukkutrygging | 50 | |
| Reiðskapur | 1.125 | |
| Útgerð | 450 | |
| Proviantur | 300 | |
| Havnagjøld | 10 | |
| Viðlíkahald | 1.400 | |
| Ymiskt | 90 | 12.175 |

Inntøkur:

| | | |
|---|---|---|
| Avreiðing av fiski | 2.000 | |
| Avreiðing royndarfisking | 1.000 | |
| Avreiðing rannsóknir | 300 | |
| Rakstrarstudningur | 800 | 4.100 |
| | | 8.075 |

---

Búskaparlig meting viðvíkjandi útskifting av skrúvuanleggi á m/s »Magnus Heinason« til skjals á Landsskrivstovuni.

---

*Viðmerkingar frá landsstýrinum:*

Konto 103143 Løn/starvsfólk.
Játtað ½ fólk til passing av telefon, ganga ørindi og til annað fyrifallandi arbeiði.
Játtað ½ fólk til at lesa nytrar v.m.

**Ad § 15 — 15703 Føroya Náttúrugripasavn**

*Sbrt. skriv dagf. 30. september 1983:*

Við hesum verður sent inn uppskot til fíggjarløgtingslóg 1984/85. Í ár skal serliga gerast vart við, at neyðugt er at skifta vindeyguni á Gamla Bókasavninum út.

Annars verður víst til viðmerkingarnar.

**Uppskot til fíggjarætlan 1984/85 og 1986/87 fyri Føroya Náttúrugripasavn, RK. 15703**

| | | 1.000 kr. Roknsk. 1982/83 | 1.000 kr. Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýris. 1984/85 | 1.000 kr. Uppskot 1985/86 | 1.000 kr. Uppskot 1986/87 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103143 | Løn — starvsfólk | 316.7 | 346.0 | 405.0 | 405.0 | 430.0 | 430.0 |
| 103168 | Løn — sáttmálalønt | 251.7 | 257.0 | 260.0 | 260.0 | 260.0 | 260.0 |
| 103222 | Løn — reingerð | 54.2 | 50.0 | 82.0 | 82.0 | 82.0 | 82.0 |
| 103288 | Løn — onnur | 90.6 | 206.0 | 220.0 | 220.0 | 220.0 | 220.0 |
| 113202 | Ferða- og dagp. innanl. | 16.9 | 10.0 | 12.0 | 12.0 | 12.0 | 12.0 |
| 113243 | Ferða- og dagp. uttanl. | 0 | 30.0 | 50.0 | 0.0 | 0.0 | 0.0 |
| 203308 | Lýsingar | 0.5 | 1.0 | 1.5 | 1.5 | 1.5 | 1.5 |
| 213105 | El, hiti og vask | 106.2 | 123.0 | 125.0 | 125.0 | 125.0 | 125.0 |
| 213503 | Umsiting | 93.3 | 235.0 | 475.0 | 475.0 | 100.0 | 100.0 |
| 213702 | Ognartrygging | 9.6 | 6.0 | 10.5 | 10.5 | 10.5 | 10.5 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 16.8 | 15.0 | 19.0 | 19.0 | 19.0 | 19.0 |
| 233051 | Innbúgv | 9.9 | 15.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 |
| 233155 | Prentlutir | 2.7 | 5.0 | 8.0 | 8.0 | 8.0 | 8.0 |
| 233259 | Postgjald | 2.8 | 3.0 | 6.5 | 6.5 | 6.5 | 6.5 |
| 233354 | Telefon og telex | 12.0 | 16.0 | 22.0 | 22.0 | 22.0 | 22.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútr. | 9.0 | 5.0 | 6.0 | 6.0 | 6.0 | 6.0 |
| 253085 | Bókakeyp | 0 | 5.0 | 9.0 | 9.0 | 9.0 | 9.0 |
| 253396 | Kanningar- og savnarb. | 62.6 | 75.0 | 85.0 | 85.0 | 85.0 | 85.0 |
| 253306 | Amboð | 0 | 20.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 2.0 | 2.0 | 2.0 | 2.0 | 2.0 | 2.0 |
| | | **1.059.5** | **1.425.0** | **1.838.5** | **1.788.2** | **1.438.5** | **1.438.5** |

*Viðmerkingar til figgjarløgtingslóg 1984/85. Føroya Náttúrugripasavn. Rakstrarstaður 15703*

1) Løn starvsfólk. Einki nýtt fólk, men savnsteknikaralærlingur liðugt útbúgvin 31/11-1984 og skal tá hava fulla løn (3. lønarflokkur eftir sáttmála millum Landsstýrið og Føroya Teknikarafelag).

2) Ferða- og dagpeningur uttanlands. Kr. 50.000. Av hesum eru frammanundan játtaðar 2 tænastuferðir til Jóannes Rasmussen (smbr. bræv Landsstýrisins frá 22/8-80). Jóhannes Johansen: ferð í Hetlandi við British Ecological Society, fund við Keld Hansen í Keypmannahavn í sambandi við arbeiðið upp á nýggja útgávu av Føroya Floru. Dorete Bloch: vísindaráðstevnu og fund í Keypmannahavn og Lund. Kristian Meitil: konservatorskeið í Keypmannahavn 10 dagar í mai. Eisini skal Eyðfinn Stefansson hava ferðina goldna úr Bremerhaven, har hann er í læru.

3) Húsaumsiting. Sum nevnt í uppskoti til seinastu figgjarlóg eru vindeyguni á Gamla Bókasavninum rotin (50 ára gomul). her eru settar 375.000 kr. til nýggj vindeygu. 275.000 kr. fast tilboð og 100.000 kr. mettar til at taka gomlu vindeyguni út og seta tey nýggju í. Takið verður lagt um nú og tá vindeyguni eru skift út, verður hesin bygningurin aftur í góðum standi.

4) Ognartrygging. Tryggingargjøldini uppfarin. DGU Føroyadeild eigur ein bil. Tað er neyðugt hjá okkum at hava hann skrokktryggjaðan, tí DGU kann ikki gjalda møguligar skaðar sum henda, tá vit nýta bilin.

5) Prentlutir. Ymist upplýsandi tilfar um framsýningarnar.

6) Post- og telefongjøld. Hesi gjøld eru uppfarin.

7) Bókakeyp. Við teimum prísum, ið eru á vísindaligum bókum er neyðugt at vit kunna nýta 9000 kr. til hetta endamál.

---

**Ad konto 103143 Løn starvsfólk**

2 skrivstovufólk, 1 konservatorur, 1 næmingur.

---

*Viðmerkingar landsstýrisins:*

Konto 113243 Ferða- og dagpeningur uttanlands:

Landsstýrið hevur avgjørt hereftir at bóka útreiðslur til uttanlandsferðir hjá teimum smærru stovnunum á rakstrarstað 11758. Um stovnurin hevur brúk fyri uttanlandsferðum, verður sum vanligt søkt um farloyvi, og útreiðslurnar verða bókaðar á rakstrarstað 11758 sundurgreinaðar soleiðis, at nøguleiki er fyri at síggja, hvussu nógv hvør stovnur til eina og hvørja tíð hevur nýtt til uttanlandsferðir.

**Ad § 15 — 15717: D.G.U. (Danmarks Geologiske Undersøgelse) Føroya Deild**

| Roknskapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýris. 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| 369.179 | 472.000 | 430.000 | 430.000 | 430.0 | 430.0 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Konto | 103048 | Endurgjald til ríkið | 225.000 kr. |
| — | 253459 | Útreiðslur viðv. arkivering og goymslu (Jarðfrøðisavnið) | 60.000 kr. |
| — | 213806 | Húsaleiga: endurgjald til Náttúrugripasavnið | 70.000 kr. |
| — | 253396 | Kanningararbeiði (sbr. DGU) | 75.000 kr. |
| | | | 430.000 kr. |

**Ad § 15 — 15755 Fróðskaparsetur Føroya**

*Sbrt. skriv dagf. 11. november 1983:*

Hjálagt verður sent landsstýrinum 2 eintøk av fíggjarætlanaruppskoti fyri stovnin, soleiðis sum setursráðið hevur góðkent tað á fundi 2. november 1983.

Uppskotið er skipað so:

a) Útfylt oyðubløð frá landsstýrinum — skjal I og II.

b) Viðmerkingar til uppskotið 1984/85 (1-19, 4 bls.).

c) Býtið av upphæddunum í uppskotinum 1984/85 á Setursskrivstovu, Gudfrøðideild, Føroyamálsdeild og Støðisútbúgving (1 bls.).

Harumframt verða send landsstýrinum til kunningar 3 serlig fylgiskjøl: A, B og C við lønarútrokningum, D við kostnaðarætlan fyri norðurlendska ráðstevnu í Føroyum.

Í mun til játtan 1983/84 hækkar samlaða uppskotið 1984/85, allar umsóknir íroknaðar, við 24% (inntøkur 0%, lønir og samsýningar +18,9%, allar aðrar útreiðslur +51,2%, her gera tvær serumsóknir størsta munin).

Samanumtikið kann sigast, at við uppskotinum 1984/85 er lagt upp til vøkstur innan bæði endamál setursins: Vísindaligt rannsóknarstarv og hægri undirvísing.

Fíggjarætlanarmetingar fyri 1985/86 og 1986/87 verða sendar landsstýrinum ein av allarfyrstu døgunum.

Vit biðja um umbering fyri, at uppskotið kemur so langt eftir ásettu freistina.

| Kontonummar og navn | | Rokn-skapur 1982 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 83904 | Ymiskar inntøkur | ÷ 33.5 | ÷ 25.0 | ÷ 25.0 | ÷ 25.0 | ÷ 25.0 | ÷ 25.0 |
| 103127 | Løn/lærarar | 365.3 | 391.0 | 611.0 | 536.0 | 536.0 | 536.0 |
| 103143 | Løn/starvsfólk | 1.049.6 | 1.195.0 | 1.392.0 | 1.317.0 | 1.317.0 | 1.317.0 |
| 103168 | Løn/sáttmálalønt | 1.883.2 | 2.228.0 | 2.519.0 | 2.444.0 | 2.444.0 | 2.444.0 |
| 103288 | Lør/onnur | 125.1 | 78.0 | 82.0 | 92.0 | 92.0 | 92.0 |
| 103509 | Samsýningar | 45.0 | 65.0 | 101.0 | 76.0 | 76.0 | 76.0 |
| 113202 | Ferða- og dagpeningur (innl.) | 22.9 | 22.0 | 43.0 | 35.0 | 35.0 | 35.0 |
| 113243 | Ferða- og dagpeningur (útl.) | 54.3 | 66.0 | 77.0 | 70.0 | 70.0 | 70.0 |
| 123103 | Skeið | 8.0 | 12.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 |
| 133053 | Fólkatryggingar | 6.0 | 6.0 | 7.0 | 7.0 | 7.0 | 7.0 |
| 203308 | Lýsingar | 12.5 | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 203403 | Dagbløð, tíðarrit | 13.7 | 13.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 213408 | Umvælingar | 9.9 | 12.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 |
| 213503 | Umsitingar | 71.5 | 50.0 | 80.0 | 80.0 | 80.0 | 80.0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 85.2 | 112.0 | 136.0 | 136.0 | 136.0 | 136.0 |
| 233051 | Innbúgv | 26.7 | 29.0 | 51.0 | 51.0 | 51.0 | 51.0 |
| 233155 | Prentlutir | 10.8 | 17.0 | 54.0 | 34.0 | 34.0 | 34.0 |
| 233259 | Postgjald | 20.6 | 19.0 | 29.0 | 29.0 | 29.0 | 29.0 |
| 233354 | Telefon og telex | 52.4 | 61.0 | 65.0 | 65.0 | 65.0 | 65.0 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 32.4 | 38.0 | 42.0 | 42.0 | 42.0 | 42.0 |
| 253085 | Bókakeyp og innbinding | 56.0 | 57.0 | 79.0 | 66.0 | 66.0 | 66.0 |
| 253306 | Amboð | 77.9 | 50.0 | 92.0 | 52.0 | 52.0 | 52.0 |
| 253314 | Aðrar umsitingarútreiðslur | 68.1 | 80.0 | 95.0 | 85.0 | 85.0 | 85.0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 47.0 | 61.0 | 176.0 | 76.0 | 76.0 | 76.0 |
| **Fróðskaparsetrið tilsamans** | | **4.110.6** | **4.657.0** | **5.776.0** | **5.338.0** | **5.338.0** | **5.338.0** |
| Tils.: | Ymiskar inntøkur | ÷ 33.5 | ÷ 25.0 | ÷ 25.0 | ÷ 25.0 | ÷ 25.0 | ÷ 25.0 |
| | Lønir og samsýningar | 3.468.2 | 3.957.0 | 4.705.0 | 3.465.0 | 3.465.0 | 3.465.0 |
| | Allar aðrar útreiðslur | 675.9 | 725.0 | 1.096.0 | 896.0 | 896.0 | 896.0 |

*) Viðmerkingar á viðheftum skjali (4 bls.)

## Viðmerkingar til uppskot til fíggjarætlan 1984/85

1) *Ymiskar inntøkur*: Tilmeldingargjald til almenn kvøldskeið.

2) *Løn/lærarar*: Undirvísingarhjálp frá leysalærarum

| | | | |
|---|---|---|---|
| Læraraskeið setursins (870 ÷ 20%) | 700 | undirvísingartímar | = 200.0 |
| Almenn kvøldskeið | 670 | — | = 125.0 |
| Próvlestur á Gudfrøðideild (Treytað av játtan til fult leiðara-starv, sbr. 4) | 270 | — | = 75.0 |
| Próvlestur á Føroyamálsdeild: | | | |
| Verandi skipan | 70 | — | = 20.2 |
| *Umsókn* | ÷ 140 | — | = 40.8 |
| Próvlestur á Støðisútbúgving: | | | |
| Verandi skipan | 370 | — | = 92.0 |
| *Umsókn* | ÷ 130 | — | = 58.0 |
| Leysalærarar tils. | 2340 | undirvísingartímar | = 611.0 |

Játtan 1983/84 svarar til 1890 leysalæraratímar: Afturat koma 190 eyka tímar til kvøldskeiðini (kunnu fíggjast við tilmeldingargjaldi).

Neyv útrokning av tilætlaðum útreiðslum til undirvísingarhjálp fíggjarárið 1984/85 — við tímatølum fyri 1982/83 og 1983/84 — er sett upp í serligum fylgiskjali til landsstýrið (fylgiskjal A)

3) *Løn/starvsfólk*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Setursskrivstova: sbrt. norm. 83/84: 3 ¼ starv (4 strvsf.) | | | 63.9 |
| ÷ *Umsókn* 84-85: ¼ starv (sí niðanfyri) | | | 12.8 |
| Føroyamálsdeild: sbrt. norm. 83/84: 3 starv (4 strvsf.) | | | 44.8 |
| ÷ *Umsókn* 84-85: ¼ starv (sí niðanfyri) | | | 11.4 |
| Støðisútbúgving: sbrt. norm. 83-84: 1 ½ starv (2 strvsf.) | | | 23.0 |
| Starvsfólk tils. | | 8 ¼ starv (10 strvsf.) | 139.3 |

Tølini eru sbrt. sáttmála frá 1.10.83, hartil 3 dýrtíðarviðbøtur.

a) Vegna vøkstur í arbeiðsuppgávum á setursskrivstovuni, verður søkt um, at yvirassistentstarvið verður skipað sum heilt starv.

b) Til at menna orðasavnsarbeiðið verður søkt um, at hálvt assistentstarv verður skipað sum ¾ starv.

Neyv útrokning av starvsfólkalønum er sett upp í serligum fylgiskjali til landsstýrið (Fylgiskjal B).

4) *Løn/sáttmálaløn*

Setursskrivstovan:

| | | |
|---|---|---|
| 1 viðbót fyri fakliga leiðslu av læraraskeiðum: | 25.0 | |
| 1 granskingarstyrkur (kandidatstipendium 12 mán) | 170.0 | |
| *Umsókn* (sí niðanfyri a) ½ starv (8 mán) | ÷ 75.0 | =270.0 |
| Gudfrøðideild: | | |
| ½ starv (galdandi normering) | 150.0 | |
| *Umsókn* (sí niðanfyri b): ½ starv til 1/1 starv | ÷ 125.0 | =275.0 |
| Føroyamálsdeild: 4 størv (galdandi normering) | | =980.0 |
| Støðisútbúgving: 4 — ( — — ) | | =944.0 |
| Sáttmálaløn tils. 9½ størv | | 2.519.0 |

a) Leiðsla av læraraskeiðum setursins (½ starv). Tey seinastu árini hevur fyrisitingin av læraraskeiðum setursins ligið beinleiðis undir setursskrivstovuni í samstarvi við ráðleggingarnevndina fyri skeiðini. Fyrisitingarliga hevur hetta virkað sera væl, men fyri dagliga virksemið er neyðugt, at skeiðini sum heild fáa eina pedagogiska og fakliga leiðslu, sum eisini kann átaka sær partar av undirvísingini. Leiðslan eigur at hava dagligt samband við føroyska skúlan (t.d. læraraskúlan ella fólkaskúlan) og hava part av starvi sínum har, tí verður bert søkt um hálvt starv.

b) Endurnýgging av umsókn frá 1981 og 1982 um at fáa broytt hálva starvið sum leiðari av Gudfrøðideildini til heilt starv. Sum er, fer undirvísingin á deildini og á læraraskúlanum (sum eigur helvt av starvinum) við allari arbeiðstíðini og væl tað. Royndirnar, síðan starvið varð skipað, eru, at einans í heilum starvi er gjørligt at fremja ta gransking, sum er ásett í starvslýsingini.

5) *Løn/onnur*

| | | |
|---|---|---|
| Setursskrivstovan: Avloysari | = | 12.0 |
| Føroyamálsdeildin: Hjálpararbeiði í samb. við høvuðsøvnini | = | 50.0 |
| Støðisútbúgvingin: Hjálpararbeiði til programmering, skráseting v.m. | = | 20.0 |
| Tímatalið *lækkað* í mun til játtan 83/84 í samb. við umsókn í viðm. 3) | | |
| Løn/onnur tils (svarandi til 1170 t.) | | 82.0 |

6) *Samsýningar*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Setursskrivstovan: | 25 alm. fyrilestrar í Havn og uttan fyri Havnina | 25.0 | |
| | Prógvtøkur í enskum dec. 1984 | 5.0 | |
| | Samsýning fyri meting av ums. til granskingarst. | 8.0 | |
| | *Umsókn:* Fundarpeningur | 12.0 | 50.0 |
| Gudfrøðideildin: | Prógvtøkur | | 5.0 |
| Føroyamálsdeildin: | Prógvtøka 1984 | 13.0 | |
| | Ymiskt | 3.0 | 16.0 |
| Støðisútbúgvingin: | Prógvtøkur (eitt næmingalið — 2 lestrargreinum | 20.0 | |
| | *Umsókn:* Prógvtøkur í samb. við upptøku 1984 av nýggjum næmingum — cin lestrargrein | 10.0 | 30.0 |
| Samsýningar tils. | | | 101.0 |

7) *Ferða- og dagpeningur (innant.)*

Upphæddin fevnir um savningarferðir, ekskursiónir, km-endurgjald, fyrilestrahaldarar av bygd, fyrilestrar uttan fyri Havnina v.m.

Ætlanin er at økja um innsavningina, serstakliga til staðanavnasavnið og málførasavnið, somuleiðis um undirvísingarvirksemini uttan fyri Havnina. Sostatt 17.000 kr í *umsókn* upp um prísvøkstur.

8) *Ferða- og dagpeningur (uttanl.)*

Stórur partur av ferðaútreiðslunum á hesi konto hevur tilknýti til samstarv/samskifti við útlendskar, serstakliga norðurlendskar stovnar.

Prógdómara- og gestalæraravitjanir fara eisini av hesi konto.

9) *Skeið:* Føroysk næmingaluttøka í Norðurlendskum sumarskeiðum

10) *Dagblað, tíðarrit*

Hækkingin á hesi konto hevur samband við tilætlaða stovnseting í 1985 av høvuðsgreinarlestri í føroyskum.

. . . . . .

11) *Umsitingar*

Húsini í J.C. Svabosgøtu 7:

| | | |
|---|---|---|
| Nýtt betonggólv í kjallarahæddini sbrt. kostnaðaræetlan | 60.0 | |
| Aðrar neyðugar ábøtur | 20.0 | 80.0 |

12) *Leiguútreiðslur*

| | | |
|---|---|---|
| Verandi høli | 124.0 | |
| *Umsókn* um leigujáttan til bókagoymslu | 12.0 | 136.0 |

Setursráðið hevur tikið undir við tilmæli frá Stødisoutlegginum um uppløku av nýggjum bæmingum 1984. Í tí heytir tað, at neyðug høli fáast, hvussu, er óvissa í lotuni. Ráðið hevur sent umsøkn aftur til spurningin.

13) *Innbúgv*

Hækkingin á hesi konto hevur samband við [illegible] í 1985 av høvuðsgreinarlestri í føroyskum

14) *Prentlutir*

| | | |
|---|---|---|
| Skrivstovutilfar | 21.0 | |
| Prenting av setursblaðnum Skorum | 13.0 | |
| *Umsókn:* Til prenting av 5. ársfrágreiðing setursins | 20.0 | 54.0 |

15) *Postgjald*

Hækking í samsvari við nummarstempling av útgangandi posti.

16) *Bókakeyp og innbinding*

Hækking upp um prísvøkstur: 7.000 kr. til nýggja próvlesturin í kristni/religión. 10.000 kr. í sambandi við tilætlaða stovnseting í 1985 av høvuðsgreinarlestri í føroyskum.

17) *Amboð*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Setursskrivstovan: | Videoútgerð til fyrilestrasalin og (fyribils) leiga av tekstviðgerðartóli | 25.0 | |
| Føroyamálsdeildin: | Monitor til videotól og (fyribils) leiga av tekstviðgerðartóli til orðabókaarbeiði | 22.0 | |
| Støðisútbúgvingin: | Undirvísingartól — serstakliga í alisfrøði | 45.0 | =45.0 |
| Tilsamans | | | 92.0 |

18) *Aðrar umsitingarútreiðslur*
(rakstur av tólum á Støðisútbúgvingini)

| | | |
|---|---|---|
| Alisfrøði (eingin broyting) | 20.0 | |
| Evna-/lívfrøði (hækking til viðlíkahald av eldri tólum) | 35.0 | |
| Dátu-/hag-/støddfrøði (servicegjald, programmleiga, rakstur) | 40.0 | =95.0 |

19) *Aðrar úttreiðslur*

Umframt vanligu upphæddirnar á hesi konto (sum í uppskotinum 1984/85 svara til *66.000 kr.*) *søkir* Føroyamálsdeildin um *20.000 kr.* eyka til savningartilfar (bond, myndir, kort v.m., sbr. viðm. 7). Harumframt endurnýggjar setrið umsókn frá 1982 um *50.000 kr.* til arkitektkanning av hølistørvi og gerð av kostnaðarætlan fyri nýbygging.

Fyrst og fremst verður hugsað um tey sera trongu hølisviðurskiftini hjá Fiskirannsóknarstovuni, ið sum kunnugt hevur innivist í hús-

unum, setrið eigur á Debesartrøð. Síðani kemur Fróðskaparsetrið sjálvt, sum heldur til í 4 ymiskum húsum. Setrið hevur tikið málið upp og samráðst við Fiskirannsóknarstovuna, ið tekur fult undir við, at setrið roynir at loysa hølistørvin við bygging á tøkum øki við Sjómansskúlan. Arkitektkanningin er fyrsta stig í hesum átrokandi máli.

Fróðskaparsetrið hevur eftir áheitan átikið sær (í juni 1984) at vera vertur fyri 9. norðurlendsku ráðstevnuni fyri universitetsadministratorar.

Kostnaðarætlanin fyri sjálva ráðstevnuna (ikki íroknað ferðaútreiðslur luttakaranna) er upp á 160.000 kr. Parturin, sum setrið verður at útvega, er settur til 25% av kostnaðinum. Sostatt umsókn á uppskoti til fíggjarætlan 1984/85 *40.000 kr.* Kostnaðarætlanin er viðløgd sum serligt fylgiskjal til landsstýrið (Fylgiskjal D).

— o — Ō — o —

*Býtið av upphæddunum í uppskotinum fyri 1984/85 við umsóknum*

SSS: Setursskrivstova (miðfyrisiting, læraraskeið, almenn kvøldskeið, almennir fyrilestrar)

GFD: Gudfrøðideild (próvlestur í kristni/religión, gransking) — fyrisitingarútreiðslur á SSS

FMD: Føroyamálsdeild (próvlestur í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum, orðabókaarbeiði, innsavning, gransking, ráðgeving)

STB: Støðisútbúgving (náttúruvísindalig støðisútbúgving við próvtøkum, gransking og ráðgeving)

| | | | SSS | GFD | FMD | STB |
|---|---|---|---|---|---|---|
| I | 83904 | Ymiskar inntøkur | ÷ 25.0 | | | |
| II | 103127 | Løn/lærarar | 325.0 | 75.0 | 61.0 | 150.0 |
| | 103143 | Løn/starvsfólk | 681.0 | | 481.0 | 230.0 |
| | 103168 | Løn/sáttmálalønt | 270.0 | 275.0 | 980.0 | 994.0 |
| | 103288 | Løn/onnur | 12.0 | | 50.0 | 20.0 |
| | 103509 | Samsýningar | 50.0 | 5.0 | 16.0 | 30.0 |
| | | LØNARKONTI TILS. | 1.338.0 | 355.0 | 1.588.0 | 1.424 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| III | 113202 | Ferða-/dagp. innl. | 8.0 | 15.0 | 15.0 | 5.0 |
| | 113243 | Ferða-/dagp. útl. | 12.0 | 5.0 | 40.0 | 20.0 |
| | 123103 | Skeið | | | 15.0 | |
| | 133053 | Fólkatrygging | 7.0 | | | |
| | 203308 | Lýsingar | 20.0 | | | |
| | 203403 | Dagbløð, tíðarrit v.m. | 4.0 | | 12.0 | 4.0 |
| | 213408 | Umvælingar | 4.0 | | 3.0 | 8.0 |
| | 213503 | Umsiting | | | | 80.0 |
| | 213806 | Leiguútreiðslur | 12.0 | | 54.0 | 70.0 |
| | 233051 | Innbúgv | 16.0 | | 30.0 | 5.0 |
| | 233155 | Prentlutir | 45.0 | | 4.0 | 5.0 |
| | 233259 | Postgjald | 20.0 | | 4.0 | 5.0 |
| | 233354 | Telefon og telex | 20.0 | | 20.0 | 25.0 |
| | 233561 | Aðrar skrivstovuútr. | 12.0 | | 20.0 | 10.0 |
| | 253085 | Bókakeyp og innbinding | 4.0 | 15.0 | 30.0 | 30.0 |
| | 253306 | Amboð | 25.0 | | 22.0 | 45.0 |
| | 253314 | Aðr. umsitingarútr. | | | | 95.0 |
| | 253903 | Aðrar útreiðslur | 120.0 | | 55.0 | 1.0 |
| | | AÐRAR KONTO TILS. | 329.0 | 35.0 | 324.0 | 408.0 |
| | | **Rakstrarstað 15755 tils.** | **1.642.0** | **390.0** | **1.912.0** | **1.832.0** |

**UPPSKOT TIL FÍGGJARÆTLAN 1984/85**

Fylgiskjal A
s. 1

103127 Løn/lærarar (undirvísingarhjálp)

a) *Læraraskeið setursins*

*Fíggjarárið 84/85 (ætlan):*

| | | |
|---|---|---|
| 7 vikur á 22 t (a 225) | | |
| 28 vikur á 24 t (a 285) | | |
| 3 skeið á 20 t (a 285) | | |
| Undirvísingartímatal tils. | 886 t | = 242,9 |
| ÷ lærarar við undirvísingarskyldu 20% | | 49,6 |
| | | 198,3 200,0 |

**Til samanberingar:**

*Lestrarárið 82-83* var
samlaða tímatalið 847t
(harav lærarar við undirvísingarskyldu góð 40%)

*Lestrarskráin 83-84* hevur uml. 950 t
(harav lærarar við undirvísingarskyldu sløk 30%)

b) *Almenn kvøldskeið*

*Fíggjarárið 84/85 (ætlan):*

| | | | |
|---|---|---|---|
| 7 vikur á 10 t (a 170) | | | |
| 20 vikur á 28 t (a 190) | | | |
| 2 skeið á 20 t (a 190) | | | |
| Undirvísingartímatal tils. | 670 t | = 125,9 | 125.0 |

**Til samanberingar:**

| | | |
|---|---|---|
| Lestrarárið 82-83 var samlaða tímatalið | 636 t | |
| Lestrarárið 83-84 (sbrt. tímatalvu) | 670 t | |
| Setursskrivstovan tils. til leysalærarar | | 325.0 |

c) *2-ára lestur í kristni/religión*

*Fíggjarárið 84/85 (ætlun):*

| | | |
|---|---|---|
| 6 vikur á 15 t (a 255) | | |
| 24 vikur á 15 t (a 285) | | |
| Undirvísingartímatal tils. | 450 t | |
| + leiðari í fullum starvi | 180 t | |
| = leysatímar tils. (í miðal a 275) | 270 t | 75.0 |

**Til samanberingar:**

*Lestrarárið 82-83* var samlaða tímatalið til 2. árs gudfrøðilestur 368 t
(harav leiðari í ½ starvi 77 t)

Fíggjarárið 83/84 er samlaða tímatalið mett til 400 t

NB Heystið 83 fór Gudfrøðideildin undir nýggjan lestur við fleiri undirvísingartímum enn gurfrøðilesturin.

Gudfrøðideildin tils. til leysalærarar 75.0

d) *Prógvnám/exam.art.-nám í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum*

*Fíggjarárið 84/85 (ætlan):*

4 vikur á 12 t (a 255)
24 vikur á 2 t (a 285)

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Undirvísingartímatal til leysalærarar | 56 t | = | 15,7 | |
| Leiðbeining í samb. við serritgerð | | | 4,5 | 20.2 |

Fylgiskjal A
s. 2

| | | | |
|---|---|---|---|
| *Ums.:* | Í gestalærari (vikusamsýning) | 4.5 | |
| | Vikutímar fyri fastan lærara í undirvísingarfrí | | |
| | 24 v á 4 t (a 285) | 27.3 | |
| | í leiðbeining til 2 serritgerð. | 9.0 | 40.8 |

**Til samanberingar:**

*Lestrarárið 82-83* var samlaða undirvísingar tímatalið til leysalærarar og gestalærarar 131 t (íroknað leiðb. til 1 serritgerð)

*Fíggjarárið 83-84* er samlaða tímatalið til leysalærarar mett til 30 t

Umframt er roknað við leiðbeining til 1 serritgerð el. sams. til gestalærara.

Føroyamálsdeildin tils. til leysalærara, gestalærara og vikart. 61.0

e) *2-ára náttúruvísindalig støðisútbúgving*

*Fíggjarárið 1984/85 (ætlan 2 lestrargreinir)*

| | | |
|---|---|---|
| Til skeið í 2. lestrarhálvu | = 30% av lestraræt lan apr.-juni<br>50 t á 255 + 50 t á 170 | 17.0 |
| Til skeið í 3. lestrarhálvu | = 35% av lestraræt lan sept.-dec.<br>125 t á 285 + 50 t á 190 | 45.0 |
| Til skeið í 4. lestrarhálvu | = 40% av lestraræt lan jan.-mars<br>70 t á 285 + 50 t á 190 | 30.0 |
| | | 92.0 |

| | | |
|---|---|---|
| Leysalærarar sostatt: | Fyrilestrar | 245 t |
| | Venjingar | 125 t |
| | Tils. | 370 t |

*Ums.*: Uppteøka av nýggjum nemingum til eina lestrargrein 84-85 (sept.-mars):
160 t á 285 + 70 t á 190 58.0

**Til samanberingar:**

*Lestrarárið 82-83* (2 lestrargreinir var samlaða leysalæraratímatalið (fyrilestrar og venjingar) 414 t

*Fíggjarárið 83/84* fevnir ætlanin um 3 lestrargreinir við samlaðum leysalæraratímatali uppá 520 t

Støðisútbúgvingin tils. til leysalærarar 150.0

Løn/lærarar, tilsamans 611.0

Undirvísingarløn til leysalærarar:

pr. 1.1.83 (prístal 100) var grundlønin 92.18. Altíð verður at leggja sáttmálahækking, dýrtíðarviðbót og frítíðarpeningur ur.

Roknað verður við teimum stigunum: 1. = 30 mín. fyrireiking
2. = 40 mín. fyrireiking

1014 *Løn/starvsfólk*

Árslønir 1984/85 sbrt. sáttmála 1.10.1983 + *3* dýrtíðarviðbøtur + 1,5% frítíðargjald av 1983-lønunum + sáttmálahækkingar 1.6.1984

*Setursskrivstovan*

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Setursskrivari í 23. lønarflokki (1.10.82 á 9. og seinasta stigi) | 182.352 | |
| 2. | Assistentur í 9. lønarflokki (1.8.83 á 14. stigi) | 143.232 | |
| 3. | Assistentur í 9. lønarflokki (1.9.83 á 5. stigi) | 127.548 | |
| 4. | Yvirassistentur í 15. lønarflokki (1.2.84 á 9. stigi — ¼) | 117.432 | |
| | Starvsfólk 1, 2, 3 og 4 (tils. 3,75 størv) | 570.564 | |
| | 1,5% frítíðargjald av 1983-løn, mett eftir játtan 1983/84 | 9.100 | |
| | + 3 dýrtíðarviðbøtur (1260 × 3 × 3,75) | 14.175 | |
| | Sáttmálahækking pr. 1.6.1984 | 19.970 | |
| | Tilsøgn um uppnormering av setursskrivara | 25.000 | |
| | Setursskrivstova tilsamans | 638.809 | 639.0 |

*Føroyamálsdeildin*

| | | | |
|---|---|---|---|
| 5. | 1 assistentur í 9. lønarflokki (1.4.80 á 14. og seinasta stigi) | 143.232 | |
| 6. | 1 assistentur í 9. lønarflokki (1.9.80 á 14. og seinasta stigi — ½) | 71.616 | |
| 7. | 1 assistentur í 7. lønarflokki (1.3.84 á 6 stigi) — ½) | 61.136 | |
| 8. | 1 savnshjálpari í 12 lønarflokki (1.3.84 á 6. lønarstigi) | 139.655 | |
| | Starvsfólk 5,6,7 og 8 (tils. 3 størv) | 415.639 | |
| | 1,5% frítíðargjald av 1983-løn, mett eftir játtan 1983/84 | 6.250 | |
| | + 3 dýrtíðarviðbøtur (1260 × 3 × 3) | 11.340 | |
| | Sáttmálahækking pr. 1.6.1984 | 14.547 | |
| | Føroyamálsdeildin tilsamans | [illegible] | 118.0 |

*Støðisútbúgvingin*

| | | |
|---|---|---|
| 9. | 1 assistentur í 9. lønarflokki (1.4.84 á 11. stigi) | 137.342 |
| 10. | 1 laborantur í 12. lønarflokki (1.8.81 á 12. og seinasta stigi ½ av 150684) | 75.342 |
| | Starvsfólk 9 og 10 (t.e. 1,5 størv) | 212.982 |
| | 1,5% fritíðargjald av 1983-løn, metl eftir játtan 1983/84 | 3.650 |
| | + 3 dýrtíðarviðbøtur (1260 × 3 × 1,5) | 5.670 |
| | Sáttmálahækking pr. 1.6.1984 | 7.454 |
| | Støðisútbúgvingin tilsamans | 229.756 230.0 |
| | **Tilsamans** | **1.317.0** |

NB: Tølini omanfyri eru sbrt. normering fíggjarárið 1983/84.

*Umsóknir:*

| | |
|---|---|
| Starv 4 (¾ - 1/1) | 42.0 |
| Starv 7 (½ - ¾) | 33.0 |
| Løn/starvsfólk tilsamans | 1.392.0 |

**Uppskot til fíggjarætlan 1984/85** Fylgiskjal C, s. 1

**Fróðskaparsetur Føroya - rakstrarstað 15755**

103168 *Løn/sáttmálaløn*

*Føroyamálsdeildin*

1. 1 lektari í málfrøði og orðabókaritstjóri (1.7.80 á 15. ári tc. seinast stigi í sáttm.)

| | | |
|---|---|---|
| a) | Bruttoársløn 1984/85 sbrt. sáttmála frá apríl 1983 | 221.904,80 |
| b) | 2 eyka dýrtíðarviðbøtur á 1248 | 2.496,00 |
| c) | Viðbót eftir avtalu við Føroya Landsstýri | 25.000,00 |
| d) | Landskassans 10% av eftirlønargjaldinum | 21.958,25 |
| | | 271.359,05 |

| | | |
|---|---|---|
| 2. 1 lektari í fólkaminnisfrøði og innsavningarleiðari (lønaraldur frá 1.1.62, t.e. á 15. ári og seinasta stigi í sáttmálanum) | | |
| a) + b) + c) + d) sum starv 1 | 271.359,05 | |
| 3. 1 adjunktur í bókmentum (1.1.84 á 5. ári) | | |
| a) | 166.663,80 | |
| b) | 2.496,00 | |
| c) | 25.000,00 | |
| d) | 16.312,03 | |
| | 210.471,83 | |
| 4. 1 adjunktur í málfrøði (1.11.83 á 5. ári) | | |
| a) | 167.582,47 | |
| b) | 2.496,00 | |
| c) | 25.000,00 | |
| d) | 16.404,00 | |
| | 211.482,47 | |
| Sáttmálalønt 1, 2, 3 og 4 | 964.672,40 | |
| + 1,5% frítíðargjald av 1983-lønum útroknað í mun til játtan 83/84 ÷ 10% eftirlønargjald | 14.105,51 | |
| Føroyamálsdeildin tilsamans | 978.777,91 | 980.0 |
| *Støðisútbúgvingin* | | |
| 5. 1 lektari í stødd/hag/dátufrøði (1.8.83 á 15. ári) | | |
| a) | 221.904,80 | |
| b) | 2.496,00 | |
| c) | 25.000,00 | |
| d) | 21.958,25 | |
| | 271.359,05 | |

| | | |
|---|---|---|
| 6. 1 adjunktur í alisfrøði (1.8.83 á 4. ári) | | |
| a) | 163.745,80 | |
| b) | 2.496,00 | |
| c) | 25.000,00 | |
| d) | 16.014,58 | |
| | 207.256,38 | |

Fylgiskjal C, s. 2

| | | |
|---|---|---|
| 7. 1 lektarastarv í lívfrøði (frá 1.10.80 er full ábyrgd og undirvísingarskylda knýtt at fólki á Náttúrugripasavninum. Afturfyri rindar setrið løn til ein savnsvørð — 1.2.84 á 15. ári) | | |
| a) | 221.904,80 | |
| b) | 2.496,00 | |
| c) | 25.000,00 | |
| d) | 21.958,25 | |
| | 271.359,05 | |
| 8. 1 lektari í evna-/lívfrøði (1.7.83 á 8. ári) | | |
| a) | 184.863,05 | |
| b) | 2.496,00 | |
| c) | 25.000,00 | |
| d) | 18.164,87 | |
| | 230.523,92 | |
| Sáttmálalønt 5, 6, 7 og 8 | 980.498,40 | |
| 1,5% frítíðargjald av 1983-lønum útroknað í mun til játtan 83/84 ÷ 10% | 13.183,56 | |
| Støðisútbúgvingin tilsamans | 993.681,96 | 994.0 |

*Gudfrøðideildin*

| | | |
|---|---|---|
| 9. 1 adjunktur og leiðari (á 15. ári) | | |
| a) bruttoløn íroknað seminariiviðbót (½ av 18.670) | 231.239,80 | |
| b) | 2.496,00 | |
| c) | 25.000,00 | |
| d) | 21.958,25 | |
| | 280.694,05 | |
| ÷ endurgjald frá Føroya Læraraskúla (upphæddir sbr. Statsoverenskomsten 83-85) | 132.514,53 | |
| | 148.179,52 | |
| 1,5% frítíðargjald av 1983-løn útroknað í mun til játtan 83/84 ÷ 10% | 1.485,00 | |
| Gudfrøðideildin tilsamans | 149.664,52 | 150.0 |

*Setursskrivstovan*

| | | |
|---|---|---|
| 10.Granskingarstyrkur (kandidatstipendium). Roknað verður við 1 árs magistaraløn á 2. ári uttan viðb. | | |
| a) | 150.198,00 | |
| b) | 2.496,00 | |
| c) | 0,00 | |
| d) | 14.672,85 | |
| | 167.366,85 | |
| Skeiðleiðsla (sersamsýning til fólk uttanseturs fyri tilrættalegging og faklíga ábyrgd av læraraskeiðum) tils. ein leiðsluviðbót | 25.000,00 | |
| | 192.366,85 | 195.0 |
| | | 2.319.0 |

*Umsóknir:*

| | |
|---|---|
| Leiðarastarvið á Gudfrøðideild (½ til 1/1) | 125.0 |
| ½ starv til leiðslu av læraraskeiðum (8 mán.) | 75.0 |
| Løn/sáttmálaløn, tilsamans | 2.519.0 |

**Fíggjarætlan fyri**

**IX Norðurlendsku ráðstevnuna fyri universitetsadministratorar á HOTEL FØROYUM 24.(25.) - 28.6. 1984**

Ábyrgd, fyriskipan, leiðsla:

| | |
|---|---|
| Fakligt: | Universitetið í Bergen |
| Praktiskt: | Universitetið í Árhus og Fróðskaparsetrið |
| Vertur: | Fróðskaparsetrið |

Luttakaratal: 40 (íroknað 4 fyrilestrahaldarar og 1 skrivara fyri norðurlendska stýrisbólkin)
Dagatal: 4



**ÚTREIÐSLUR:**

| | |
|---|---|
| Ráðstevnuhøli og vistarhald (÷ 3 máltíðir), sbrt. sáttmála | 94.400 |
| Bussleiga (av flogvølli og aftur + útferð) 20 t. á 450 | 9.000 |
| 2 vanligar máltíðir (4 fólk) | 8.000 |
| 1 fráfaringarsamkoma (50 fólk) | 12.500 |
| Eyka skrivarahjálp + tilfar | 3.100 |
| | 127.000 |

**INNTØKUR:**

| | |
|---|---|
| Ráðstevnugjald frá 35 luttakarum | 95.000 |
| Umsókn um ískoyti úr »felagskassa« | 25.000 |
| **Umsókn frá setrinum um játtan á fíggjarlóg 1984/85** | **40.000** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| + 4 fyrilestrahaldarar (gestir úr Danmark, Svøríki, Noregi, Finnlandi) — Ferðaútreiðslur | 8.000 | | |
| **Tilsamans** | **160.000** | **Tilsamans** | **160.000** |

Stevnuluttakararnir rinda sjálvir ferðina til Føroya og aftur.

iðm. Eftir at samstarvið millum norðurlendskar universitetsadministratorar er komið í fasta legu, verður ikki søkt um stuðul úr Norðurlanda Mentanargrunninum til árligu ráðstevnurnar, harafturímóti til serskeið og -ráðstevnur, ið spretta úr samstarvinum. Soleiðis fekk fyrsta norðurlendska ráðstevnan fyri lestrarvegleiðarar á universitetum (feb. 1983 í Danmark) studning. — Fróðskaparsetrið er komið upp í norðurlendska universitetssamstarvið í 1981.



*Ómerkingar landsstýrisins:*

Konto 103143 ¼ assistentur ikki játtaður
¼ yvirassistentur ikki játtaður
Konto 103168 Løn/sáttmálaløn: ½ starv til pedagogiska leiðara á læraraskeiðinum ikki játtað.
Leiðarastarv til gudfrøðideildina játtað, fulla tíð.

**Ad § 15 - 15793 Stovnarnir á Debesartrøð**

Sbrt. skriv dagf. 8. november 1983:

Hjálagt verður — við góðkenning stovnanna — sent landsstýrinum uppskot til fíggjarætlan 1984/85 fyri rakstrarstað 15793: Stovnar á Debesartrøð.

Uppskotið er samskipað av setursskrivstovuni, ið sum kunnugt hevur umsitingina av felagsrakstrinum um hendur.

Í fíggjarárunum 1985/86 og 1986/87 verður roknað við somu upphæddum sum í 1984/85 uppskotinum.

| Kontonummar og navn | | Roknskapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýris. 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103143 | Løn - starvsfólk | 134.7 | 138.4 | 154.0 | 154.0 | 154.0 | 154.0 |
| 103151 | Løn - avloysarar | 0 | 10.0 | 11.1 | 11.1 | 11.1 | 11.1 |
| 103222 | Løn - reingerð | 240.4 | 270.4 | 284.2 | 284.2 | 284.2 | 284.2 |
| 103288 | Løn - onnur | 110.4 | 117.9 | 124.0 | 124.0 | 124.0 | 124.0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 339.2 | 449.3 | 438.5 | 438.5 | 438.5 | 438.5 |
| 213408 | Umvælingar o.a. | 14.7 | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 213702 | Ognartrygging | 20.3 | 25.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 |
| 213702 | Ymiskar húsaútreiðslur | 11.9 | 25.0 | 31.5 | 31.5 | 31.5 | 31.5 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 65.5 | 61.0 | 68.0 | 68.0 | 68.0 | 68.0 |
| 253355 | Umsiting av Debesartrøð | 6.3 | 15.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 6.0 | 10.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 |
| **Samanlagt** | | **950.1** | **1.147.0** | **1.298.3** | **1.188.3** | **1.188.3** | **1.188.3** |

**Viðmerkingar til uppskot til fíggjarløgtingslóg 1984/85.**

*Rakstrarstað 15907/323173: Stovnarnir á Debesartrøð*

| | | | |
|---|---|---|---|
| 103143 | *Løn/starvsfólk* t.e. húsavørðurin á øllum stovnum og deildum, 9 lønarfl. 14. stig. | | |
| | Løn sbr. sáttmála 1.10.83 | 143.232 | |
| | Sáttmálabundin lønarhækking 1.6.84 | 5.013 | |
| | 3 dýrtíðarviðbøtur | 3.780 | |
| | frítíðargjald av 1983-lønum uml. | 2.025 | 154.0 |
| 103151 | *Løn/avloysarar* fyri húsvørðin í summar-frítíðini, mett til 17 t á 60/- + 9,5% | | 11.1 |
| 103222 | *Løn/reingerð:* 4 vaskikonur løntar fyri tils. 3870 tímar/árið. Prístal 1.7.83 | | |
| | (54,19 + 5,-) × 3870 uml. | 230.000 | |
| | frítíðargjald av 1983-løn uml. | 3.500 | |
| | mett lønarhækking | 10.200 | |
| | Høvuðsreingerð 350 t á 73,10 + 9,5% | 27.560 | |
| | Avloysarar 200 t. á 60,- + 9,5% uml. | 13.000 | 284.2 |
| 103288 | *Løn/onnur* t.e. umsjónarmaður, sum røkir Debesartrøð (arb.mannaløn) ársløn uml. | 110.800 | |
| | hjálparmaður til húsavørðin m.a. at røkja Müllerstrøð at arbeiða fyri arbeiðsmanna-løn, ársløn uml. | 110.800 | |
| | Viðm.:Umsókn um játtan til hjálparmann til húsavørð verður uppafturtikin frá seinasta ári, tí húsavørðurin er ovbyrjaður sum er. | | |
| | Mett lønarhækking fyri umsjónarmann og hjálparmann tils. | 10.000 | |
| | Maður, sum hevur flaggingina undir hond fyri fasta árliga samsýning | 2.400 | 234.0 |

213105 *El, hiti og vask*

El: felagsmálari fyri alla nýtslu minus
Fornminnissavn, J.C. Svabosgøtu 9 og 19
og Landsbókasavnið. Nýtsla 82/83 156.880 kWt,
kW.-gjald 2988 kr.

| | | |
|---|---|---|
| 1984/85 meting: kW-gjald | 3.500 | |
| 160.000 kWt á 1,- | 160.000 | |
| J.C. Svabosgøta 7 og 19 | 25.000 | |

Hiti: Seturshús (a), Starvsstovuhús (b)
J.C. Svabosgøta (c):

| | | | |
|---|---|---|---|
| Ávist 82/83 | a) 19.927 ltr. | 81/82 | 18.225 |
| | b) 37.023 - | | 34.310 |
| | c) 5.736 - | | 5.569 |
| | 62.686 | | 58.134 |

| | | |
|---|---|---|
| 1984/85-meting: 65.000 litrar uml. | 250.000 | |
| Vask: Samkeyp av tí, omanfyri nevndu 4 vaskikonur nýta. Nýtsla 82/83 13.680 kr. | | |
| Mett nýtsla 84/85 | 15.000 | |
| El, hiti og vask tils. | 453.500 | |
| - leiguinntøkur fyri búrúm uml. | 25.000 | 428.5 |

213408 *Umvælingar* (útreiðslur sum illa fáast liðaðar sundur millum stovnarnar + amboð til húsavørðin 30.0

213702 Ognartrygging (brunatrygging) 7.0

213901 *Ymsar húsaútreiðslur*

| | |
|---|---|
| Kloakkreinsing og viðlíkahald | 7.5 |
| Kaminreinsing — øll búsini | 6.0 |
| Oljufýrs- og hitastýringsrøkt | 5.000 |
| Viðlíkahald av fløggum og flaggstong | 2.000 |
| Náttarvakt | 14.000 |
| Óvæntaðar húsaútr. | 3.000 |

31.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 23361 | *Aðrar skrivstovuútreiðslur* | | |
| | Leiga og nýtsla av 2 Xerox-tólum til allar stovnar uttan Landsskjalasavnið og landsbókasavnið + leigu av 12 teljarum | 48.000 | |
| | Tilfar (pappír o.a.) | 20.000 | 68.0 |
| 253355 | *Umsiting av Debesartrøð* | | |
| | Planting og tilfar til at halda trøðna í góðum standi | | 17.0 |
| 253903 | *Aðrar útreiðslur* | | 15.0 |
| | | | 1.230.3 |

*Viðmerking frá landsstýrinum:*

Hjálparmaður hjá húsvørðinum, konto 103288 løn onnur, kr. 110.000, ikki játtað.

## Ad § 15 - 15805 Heilsufrøðilig Starvsstova

*Sbrt. skriv dagf. 26. september 1983:*

*Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1984/85 og meting um 1985/86 og 1986/87*

Á fundi 23. sept. 1983 á starvsstovuni, varð avgjørt at seta upp soljóðandi uppskot til fíggjarætlan 1984/85:

**Rakstrarstað 15805 Heilsufrøðilig Starvsstova**

| Kontonummar og navn | | Roknskapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýris. 1984/85 | Príslega 1985/86 Ætlan í 1.000 kr. | 1984/85: 1986/87 Ætlan í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 83904 | Ymiskar inntøkur | ÷ 144,9 | ÷ 300,0 | ÷ 200,0 | ÷ 300,0 | ÷ 300.0 | ÷ 300.0 |
| 103143 | Løn - starvsfólk | 617,8 | 650,0 | 795,4 | 674.9 | 674.9 | 674.9 |
| 103151 | Løn - avloysarar | 19,0 | 55,0 | 76.0 | 76.0 | 76.0 | 76.0 |
| 103168 | Løn - sáttmálalønt | 400,0 | 422,0 | 834,5 | 644.0 | 644.0 | 644.0 |
| 103288 | Løn - onnur | 20,9 | 25,0 | 28,0 | 28.0 | 28.0 | 28.0 |
| 103405 | Úrtíðarlønir | 7,7 | 10,0 | 15,0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 |
| 113202 | Ferða- & dagpen. innanl. | 12,6 | 25,0 | 25,0 | 25.0 | 25.0 | 25.0 |
| 203308 | Lýsingar | 3,7 | 10,0 | 13,0 | 13.0 | 13.0 | 13.0 |
| 213503 | Umsiting | 35,1 | 40,0 | 10,0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 |
| 213702 | Ognartrygging | 2,2 | 3,0 | 8,0 | 8.0 | 8.0 | 8.0 |
| 233051 | Innbúgv | 8,3 | 0,0 | 30.0 | 30.0 | 30.0 | 30.0 |
| 233155 | Prentlutir | 3,2 | 8,0 | 20,0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 233259 | Postgjald | 5,8 | 7,0 | 10,0 | 10.0 | 10.0 | 10.0 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 233354 | Telefon og telex | 19,2 | 36,0 | 45,0 | 45.0 | 45.0 | 45.0 |
| 233504 | Sakkøn hjálp | 9,0 | 15,0 | 15,0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 9,5 | 20,0 | 20,0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 253085 | Bókakeyp og innbinding | 46,1 | 30,0 | 30,0 | 30.0 | 30.0 | 30.0 |
| 253306 | Amboð | 60,7 | 525,0 | 250,0 | 250.0 | 250.0 | 250.0 |
| 253371 | Rannsóknir | 28,5 | 60,0 | 60,0 | 60.0 | 60.0 | 60.0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 40,3 | 45,0 | 45,0 | 45.0 | 45.0 | 45.0 |
| 253928 | Tænastuakfør, rakstur | 13,1 | 15,0 | 15,0 | 15.0 | 15.0 | 15.0 |
| 253936 | Laboratoriurakstur | 168,6 | 175,0 | 300,0 | 300.0 | 300.0 | 300.0 |
| | | **1.387,2** | **1.876,0** | **2.444,9** | **2.033.9** | **2.033.9** | **2.033.9** |

| | | |
|---|---|---|
| *Brúkt í %* | 1982/83 | 98,5% |
| *av játtan-* | 1981/82 | 96,3% |
| ini: | 1980/81 | 85,3% |

Peningaupphæddir, ið eru játtaðar til royndir við svartkjafti og hagreiðing/snarkøling, eru ikki við í uppgerðini.

*Viðmerkingar:*

Sagt skal vera alt fyri eitt, at starvsstovan følir seg ikki at vera bundna av at nýta allar játtanir, um so er, at mett verður í sjálvum figgjarárinum, at ein játtan ella ein partur av eini játtan ikki nýtist at verða nýttur.

Somulciðis um broytingar verða gjørdar, er ynskiligt, at landsstýrið og figgjarnevndin talar við starvsstovuna.

*83904 Ymiskar inntøkur*

Mett verður hiðani, at ein øking av »Ymiskum inntøkum« frá 100.000 kr, ið okkara uppskot fyri 1983/84 til 300.000 kr., ið var uppskot landsstýrisins, er ein alt ov stórur munur, tá hugsað verður um, at bert **ein** hálvur laborantur varð játtaður afturat á figgjarlógini fyri 1984/85.

Mett verður, at inntøkurnar í 1984/85 verða 200.000 kr.

| *103143 Løn-starvsfólk* | | **Játtan 1983/84** | **Uppskot 1984/85** |
|---|---|---|---|
| A. | Skrivstovufólk (9. lfl.) | 128,3 | 139,0 |
| B. | Laborantur (9. lfl.) | 69,0 | 122,5 |
| C. | Laboratoriuteknikari (12. lfl.) | 128,1 | 132,7 |
| D. | Hospitalslaborantur (12.lfl. ½ dag) | 69,0 | 74,3 |
| E. | Hospitalslaborantur (12.lfl. ½ dag) | 140,2 | 74,9 |
| F. | Laboratoriuteknikari (12.lfl.) | 115,4 | 131,5 |
| G. | Laborantur (9. lfl.) | — | 120,5 |
| | | **650,0** | **795,4** |

Lønirnar eru pr. 1. juli 1983 + 4 prístalsviðbøtur.

*) Roknast má við, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan um ikki so leingi skal hava ein minni bil, sum er serliga útgjørdur til prøvatøku av ymiskum slag.

*103152 Løn - avloysarar*

Søkt verður um 76.000 kr., sum er ein hækking uppá 21.000 kr.

*Meting:*

| | |
|---|---|
| 1×1 barsilsvikariat á 5 mðr. á 11.000 | 55.000 kr. |
| 1×1 summarfrítíðaravloysari á 2 mðr. á 10.500 kr. | 21.000 - |
| | Tils. 76.000 kr. |

*103168 Løn - sáttmálaløn*

| | Játtan 1983/84 | Uppskot 1984/85 |
|---|---|---|
| A. Deildarleiðari (sáttmáli millum Før. Verkfrøðingafelag og Før. Landsstýri) íroknað pensiónsgjald, 4 før. prístalsviðbøtur og leiðaraviðbót. | 219,4 | 244,5 |
| B. Deildarleiðari (samb. sáttmála millum Finansministeriet og Dansk Dyrlægeforening) íroknað 4 danskar prístalsviðbøtur, deildarleiðaraviðbót og pensiónsgjald. | 202,6 | 210,0 |
| C. Djóralækni | 0,0 | 190,0 |
| D. Kemikari | 0,0 | 190,0 |
| | 422,0 | 834,5 |

Lønirnar eru pr. 1. juli 1983 + 4 prístalsviðbøtur.

Vegna tað vaksandi tal av alibrúkum í Føroyum er avgerandi neyðugt, at játtaður verður ein djóralækni (C), ið burturav kann taka sær av eftirliti og ráðgeving í samband við hesa vinnu. Tá hugsað verður um tær potentiellu inntøkurnar, ið liggja í alingini í Føroyum í dag — og ikki minst hvør skaði kann standast av, um vinnan ikki verður umsitin og leiðbeind á rættan hátt, má setan av einum fólki, ið hevur rætta støði til at gerast serkønur á hesum øki, vera minsta krav til myndugleikarnar.

Ein kemikari (D) skal arbeiða við analysuspurningum í samband við at seta upp nýggjar analysuhættir. Harafturat skal viðkomandi gera tær meira avanceraðu analysurnar, t.d. í samband við umhvørviskanningar.

*103288 Løn - onnur*

Søkt verður um 28.000 kr., sum er ein hækking uppá 3.000 kr.

Kontoin verður nýtt til ymsar útreiðslur í samband við eftirlit og tøku av prøvum og tímalønta uppvaskihjálp.

*103405 Úrtíðarlønir*

Søkt verður um 15.000 kr., sum er ein hækking uppá 5.000 kr.

Víst verður til roknskapin pr. 1.8.83, sum vísir, at 7.944,23 kr. longu eru nýttar av teim játtaðu 10.000 kr.

*113202 Ferða- og dagpeningur, innanlands*

Óbroytt

*203308 Lýsingar*

Søkt verður um 13.000, sum er ein hækking uppá 3.000 kr.

Víst verður til roknskapin pr. 1.8.83, sum vísir at 6.559,50 kr. longu eru nýttar av teim játtaðu 10.000 kr.

*213503 Umsiting*

Søkt verður um 10.000 kr.

*213702 Ognartryggingar*

Søkt verður um 8.000 kr., sum er ein hækking uppá 5.000 kr.
Víst verður til roknskapin pr. 1.8.83, sumv ísir at 5.747,00 eru nýttar.

*233155 Prentlutir*

Vegna prenting av ársfrágreiðing, verður søkt um 20.000 kr.

*233259 Postgjald*

Søkt verður um 10.000 kr.

*233354 Telefon og telex*

Søkt verður um 45.000 kr. Økingin uppá 9.000 kr. er vegna økta telefongjaldið uppá 25% pr. 1. okt. 1983.

*233504 Sakkøn hjálp*

Óbroytt.

*233051 Innbúgv*

Søkt verður um 30.000 kr. Peningurin skal fyrst og fremst nýtast til keyp av stinkskápum og bókahillum.

*233561 Aðrar skrivstovuútreiðslur*

Óbroytt

*253085 Bókakeyp og innbinding*

Óbroytt

*253306 Amboð*

Søkt verður um 250.000 kr.

*253371 Rannsóknir*

Óbroytt.

*253903 Aðrar útreiðslur*

Óbroytt.

*253928 Tænastuakfør, rakstur*

Óbroytt

*253936 Laboratoriurakstur*

Søkt verður um 300.000 kr., sum er ein hækking uppá 125.000 kr.

Orsøkin til hesa hækking er fyrst og fremst tær umlivørviskanningar, ið skulu gerast av ávísum firðum og sundum fyri dálking í samband við aling av fiski.

*Viðmerkingar landsstýrisins:*

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur søkt um 3 nýggj fólk ífiggjarárinum 1984/85,
konto 103143 Løn/starvsfólk 1 laborant,
konto 103168 Løn/sáttmálalønir 1 djóralækna og 1 kemikara.

Landsstýrið kann bert taka undir við at játta 1 akademiskan medarbeiðara til heilsufrøðiligu starvsstovuna, primært til løggilding av skipum, og verður starvsstovan sjálv at meta um, hvør útbúgving hevur 1. prioritet.

1 laborantur og 1 akademiskur medarbeiðari verða sostatt ikki játtaðir í 1984/85.

**Að § 15 - 15895 Tónleikur og sangur**

Tann av landsstýrinum tilmælta upphædd á figgjarløgtingslóg 1984/85, § 15, rakstrarstað 15895: Tónleikur og sangur, kr. 750.000,-, er ætlað at býta soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| Meginfelag av dansifeløgum | kr. | 50.000,- |
| Kórsamband Føroya | - | 40.000,- |
| Meginfelag av Hornorkestrum* | - | 80.000,- |
| Royndarmusikkskúlin v.m. | - | 460.000,- |
| Konsertfelagið | - | 60.000,- |
| Musikkvitjanir | - | 20.000,- |
| Landsstýrinum at ráða yvir | - | 40.000,- |
| Ialt | kr. | 750.000,- |

* Hornorkestrini gjalda nú fullan toll av instrumentum.

**Ad § 15 - 15895 Tónleikur og sangur**

*Sbrt. skriv dag. 27. oktober 1983 frá Tórshavnar Musikkskule*

Eftir áheitan senda vit við hesum fíggjarætlan Tórshavnar musikkskúla fyri 1984/85.

Í inniverandi fíggjarári hevur Landsstýrið játtað at gjalda musikkskúlanum somu upphædd sum Tórshavnar býráð, og eftir hesi meginreglu, fara vit at loyva okkum at søkja um ein studning uppá kr 230.000,00 svarandi til helvtina av fíggjarætlanini.

Vit vóna, at henda umsókn verður viðgjørd við vælvild.

| | **Uppskot stovnsins 1984/85** |
|---|---|
| 1 lærari - violin og viola | kr. 100.000,- |
| 1 lærari - cello (kontrabass) | 100.000,- |
| 1 lærari - klaver, orgul og cembalo | 100.000,- |
| 1 lærari - sang, kórleiðslu og teori | 100.000,- |
| Tryggingar og viðlíkahald av instrumentum | - 15.000,- |
| Bótar og tílíkt | 5.000,- |
| Umsiting, ferðaútreiðslur o.a. | - 15.000,- |
| Næmingastudningur | - 15.000,- |
| Útreiðslur tilsamans | kr. 480.000,- |
| - næmingagjald | - 50.000,- |
| | kr. 430.000,- |

**Ad § 15 - 15895 Tónleikur og sangur**

*Sbrt. skriv dagf. 29. oktober 1983 frá Kon ertfelagnum:*

Hjálagt senda vit roknskap fyri rakstrarár 1982-83.
Felagið søkir hervið um blokkstudning til komandi tiltøk í 1984.

Vit senda hervið eina uppseting fyri komandi tiltøk, sum Konsertfe lagið ætlar at skipa fyri og stuðla:

| | | |
|---|---|---|
| Gudrun Fridbjørg internat. kend ait | kr. | 6.000,- |
| Vestjysk Kammerensemble | | 5.000,- |
| Tiltakið stuðlað av Da.Fæ.Kult.fond o<br>Konsertfelagnum | | |
| Duo Grenzino<br>Da.F.Kult.fond og Konsertfel. | | 5.000,- |
| Susan Tomas og Zoltan Toth<br>Arr. Konsertfel. | | 8.000,- |
| Dou Concertante<br>Da.Fæ.Kult.fond og Konsertfel. | | 5.000,- |
| Holte Gymnasiums Symfoniorkester | | 5.000,- |
| Tove Hyldgård og Tonny Landy<br>Arr. Konsertfel. | | 10.000,- |
| John Damgård | | 5.000,- |
| Árni Hansen, Jens Smith, Martin Mouritsen | | 5.000,- |
| Meirútreiðslur við útgávu av blaðnum »tónleikur & myndlist« annan hvønn mánað | | 16.000,- |
| Tilsamans | kr. | 70.000,- |

Við vón um at hendan umsókn verður gingin á møti

Konsertfelagið
3800 Tórshavn

*Rakstrarroknskapur 01.09.82 - 01.09.83*

*Inntøkur*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Limagjald | kr. | 22.390,00 | |
| Atgongupeningur | - | 28,686,00 | |
| Studningur | - | 60.000,00 | |
| Rentuinntøkur | - | 29,46 | 11.105,46 |

*Útreiðslur*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Umboðan | kr. | 9.028,67 | |
| Leiga av hølum | - | 4.100,00 | |
| Skrivstovuhald | - | 1.094,90 | |
| Postgjald og telefon | - | 6.815,00 | |
| Lýsingar | - | 3.607,62 | |
| Ferðapeningur | - | 2.640,00 | |
| do. til listafólk | - | 45.883,00 | |
| »Tónleikur og myndalist« | - | 1.650,00 | |
| Rentuútreiðslur | - | 2.200,50 | |
| Annað | - | 2.430,46 | |
| Avskriving av kopim. | - | 7.000,- | 86.450,15 |
| Ársúrslit | | | 24.655,31 |

**Figgjarstøða pr. 01.08.83**

*Ogn*

| | | |
|---|---|---|
| Kassapeningur | | kr. 164,04 |
| Kekk-konto, Sjb. | | - 3.090,60 |
| Postgiro | | - 589,70 |
| Føroya Banki | | 2.836,68 |
| Kopimaskina: | | |
| Keypsprísur | 27.785,00 | |
| ÷ Avskriving | 7.000,00 | - 20.785,00 |
| | | Kr. 27.465,91 |

*Skuld*

| | | |
|---|---|---|
| Fórshavnar kommunuskúli | | kr. 1.500,00 |
| Læraraskúlin | | - 200,00 |
| Strandferðslan | | - 660,00 |
| Eginpeningur: | | |
| saldo 01.09.83 | 450,60 | |
| Ársúrslit | 24.655,31 | 25.105,91 |
| | | Kr. 27.465,91 |

Eg havi grannskoðað roknskapin og hildið hann saman við bøkur og skjøl.

Einki funnið at átala

**Ad § 15 - 15907/323012 Barnablað**

*Sbrt. skriv frá Barnablaðnum dagf. 13. september 1983:*

Rakstrarroknskapur fyri »Barnatíðindi« 1982

**Inntøkur:**

| | |
|---|---|
| Lýsingar, blaðhald, søla | kr. 8.590 |
| Løgtingsstudningur | — 5.000 |
| | kr. 13.590 |

Útreiðslur:

| | | |
|---|---|---|
| Prenting, tilfarsrit o.a. | kr. | 3.900 |
| Postgjald, box | — | 1.050 |
| Telefon | — | 970 |
| Ljós, hiti, reingering | — | 2.200 |
| Annað | — | 300 |
| Samsýning | — | 5.170 |
| | kr. | 13.590 |

Ókeypiseintøk verða send teimum lýsandi.
— — — skúlabørnum.
— — — sjúkrahúsum.
Haldarar: 200, haldaragjald kr. 25 um árið.

Viðvíkjandi ætlan fyri 1985/86 og 1986/87, so verður hon lutfalsliga tann sama sum í ár — ætlandi lítil og eingin broyting.

*Sbrt. skriv dagfest 30. september 1983 frá Bókadeild Føroya Lærarafelags:*

Vísandi til skriv tykkara frá 11. aug. í ár — F.L.j.nr. 400-36 — loyvi eg mær vegna Bókadeild Føroya Lærarafelags at søkja um studning til Barna- & ungdómsblaðið

*kr. 60.000,-*

Hetta tal er 10.000 størri enn seinasta umsókn, tí undirskotið av blaðnum er ovurstórt, u.l. 80.000 kr., og tyngir hetta munandi raksturin av BFL.

Upplýsast skal, at haldaragjaldið er hækkað, og somuleiðis er haldaratalið eisini hækkað, men tó ikki meira enn, at vanligur prísvøkstur fer við hesum vøkstri.

Vit vóna, at tað ber til at ganga hesi umsókn á møti, tí vit halda tað hava sera stóran týdning, at uppvaksandi ættarlið fær nógv og gott lesitilfar á móðurmálinum.

*Skjal 1.*

| Kontonummar og navn | | Roknskapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot 1984/85 |
|---|---|---|---|---|
| 15907/323012 | Barna- & ungdómsblaðið | 10.000 | 15.000 | 60.000 |

**Ad § 15-15907/323037 Sjónleikur**

*Sbrt. skriv dagf. 6. oktober 1983 frá Sjónleiksbólkinum Grima:*

Viðv. fíggjarætlan 1984/85

Við hesum verður søkt um, at peningurin, sum játtaður er á fíggjarløgtingslógini til sjónleik verður hækkaður, soleiðis at sjónleikur yvirhøvur kann fáa betur umstøður at virka í.

Søkt verður um, at vit fáa hækkað okkara stuðul frá 120.000 kr. til *500.000 kr.*

Sum grundgeving til hesa stóru hækkan er ynski okkara um, at leikbólkurin aftur skal kunna telja 5 fólk, sum kunna arbeiða burturav við sjónleiki fullan dag og alt árið.

Virki okkara er seinastu árini skert ógvuliga nógv orsakað av vánaligu fíggjarligu orkuni. Tað at fólk bert fáa tryggjaða løn fyri styttri tíðarskeið skapar vánaligan »kontinuitet« í arbeiðnum. Hetta inniber, at tað, sum er aðaltáttur í endamálsgrein okkara, »at skapa leiklist, ið hevur beinleiðis tilknýti til tað føroyska samfelagið fyrr og nú«, er við at detta burtur.

Hetta meta vit er skaðiligt fyri føroyskan sjónleik sum heild, tá hugsað verður um tað ómetaliga stóra árin, vit í løtuni eru fyri uttanífrá á tí mentunarligu økinum.

Viðmerkjast skal tó, at fólk sum hava verið við til at stovna Grímu, og sum hava verið virkin í sjónleikarlívinum í Føroyum í løtuni eru undir útbúgving innan leikkynstri.

At arbeiði okkara innan undirvísing eisini hevur borið frukt sæst eisini av, at ungfólk, sum hava gingið á skeiðum hjá okkum, hava í umbúna at fáa sær útbúgving innan sjónleikarøkið.

Eitt mál hjá okkum er tí at virka so fyri, at hesi fólk skulu hava nakað at koma heim aftur til, so føroyskur sjónleikur kann fáa tann listarliga innblástur hann hevur so fyri neyðini.

Vit heita tí á fíggjarnevnd Løgtingsins um at veita okkum vælvild við at játta nevndu peningaupphædd, so at í minsta lagi 5 fólk fáa tryggjaða eina rímuliga ársinntøku.

Virksemið hjá Grímu annars er nærri lýst í fyrr innsendum umsóknum — seinast fyri f.a. 1982/83 — og er ynski og vón okkara bert, at vit kunnu styrkja hetta virksemi.

Sum uppskot um, hvussu hetta kann gerast kundi kanska verið vert at tikið »Álit í Mentanarspurningum« frá 1972 fram aftur og havt tað, við teimum broytingum, sum tíðin hevur gjørt neyðugar, sum støði undir nýggjum samráðingum og umhugsingum um, hvussu sjónleikur í Føroyum fær berur kor og Leikpallur Føroya verður veruleiki.

Gríma hevur øll árini stórt sæð virkað eftir uppskotinum til lógir og skipan av Leikpalli Føroya við teimum skerjingum, sum hava verið orsakað av fíggjarligu neyðarstøðuni.

Við vón um, at henda okkara umsókn verður viðgjørd við vælvild.

*Sbrt. skriv dagf. 20. oktober 1983 frá Meginfelag áhugaleikara Føroya:*

Meginfelag áhugaleikara Føroya takkar fyri játtaðan stuðul í hesum fíggjarári, og loyvir sær við hesum at søkja um 232.000,- kr úr landskassanum fyri fíggjarárið 1984/85 smbrt. fíggjarætlan felagsins fyri 1984, sum er løgd við her saman við grannskoðaða roknskapinum fyri 1982.

Orsøkin til at roknskapur fyri 1982 vísir upp á seg stórt rakstrarav-lop er, at vit enn einaferð hava skipað skeiðvirksemi felagsins beint eftir nýggjár og fram ímóti sumri 1983.

Vit viðleggja roknskap fyri norðurlendska ungdómsskeiðið, sum varð hildið í Norðurlandahúsinum fyrst í august mánað í ár, og skulu viðmerkja, at vit koma at senda landsstýrinum eitt tilfarssavn viðvíkjandi skeiðnum, samstundis sum vit vilja siga frá, at felagið prioriterar skeiðvirksemi fyri tey ungu.

Felagið veitir limafeløgunum og øðrum áhugaðum ráð og leiðbeiningar, eins og figgjarligur stuðul verður latin ungfólki serliga, ið hevur hug at leita sær útbúgving og kunnleika um leiklist, tá høvi býðst.

Skipað verður fyri fundum og skeiðum. — Roynt verður eisini at birta lív í aftur sjónleikarfeløg, sum ikki hava verið virkin seinastu árini. Onnur feløg — ungmannafeløg, bygdafeløg o.s.fr. — sum eisini fáast við sjónleik eru væl komin sum limir.

Við vón um vælvild og góða undirtøku sendir felagið inn hesa umsókn um studning fyri 1984/85 upp á 232.000,- kr.

Roknskapurin til skjals á Landsskrivstovuni.

Viðmerking frá landsstýrinum:
Játtaðar verða 300.000 kr. til sjónleik.

**Að § 15 - 15907/323053 Útgáva av barnabókum**

*Sbrt. skriv dagf. 30. september 1983 frá Bókadeild Føroya Lærarafelags:*

Vísandi til skriv tykkara dagsett 11. aug. 1983 - F.L.j.nr. 400-36 — loyvi eg mær vegna Bókadeild Føroya Lærarafelags at søkja um studning at geva út barna- og ungdómsbøkur fyri

*kr. 550.000,-*

og er hetta tal 100.000 kr. størri enn seinasta játtan. Hetta kemst av, at vit, sum nevnt í seinastu umsókn, nú leggja høvuðsdentin á ungdómsbøkurnar. Hetta krevur størri íløgur, tí bøkurnar eru væl størri enn tær til tey smærri børnini.

Vit vóna, at tað liggur fyri at játta hesi umsókn

*Skjal 1.*

| Konto | | Rokn-skapur 1982 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15907/323053 | Bókadeild Føroya Lærarafelags | 500.000 | 450.000 | 550.000 | 500.000 | 500.0 | 500.0 |

*Viðmerking frá landsstýrinum:*

Játtaðar verða 500.000 kr. til útgávu av barnabókum.

**Ad § 15 - 15907/323116 Skúlabókaútgáva**

*Sbrt. skriv dagfest 29. september 1983:*

Fyri Føroya Skúlabókagrunn skal eg, eftir at nevndin hevur kannað um tær útreiðslur, ið væntandi koma at verða fíggjarárið 1984/85, heita á landsstýrið um at seta á fíggjarløgtingslógina sum studningsveitan *kr. 1.000.000,-*

Viðlagt verður sent landsstýrinum:

1. Yvirlit yvir væntandi útreiðslur hjá Føroya Skúlabókagrunni 1984/85.
2. Skjal I.
3. Skjal II.
4. Yvirlit yvir ætlan fyri 1985/86 og 1986/87.
5. Roknskapur fyri 1982/83.
6. Yvirlit yvir grunsins bøkur á goymslu hjá BMS 1. apr. 1983.
7. Yvirlit yvir útkomnar bøkur 1. okt. 1982 — 30. sept. 1983.
8. Yvirlit yvir handrit, sum arbeitt verður við.

*I. Yvirlit yvir væntandi útreiðslur hjá Føroya Skúlabókagrunni 1984/85*

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Til bókaútgávu | kr. 1.050.000,- |
| 2. | Renta av kassakreditti | — 27.000,- |
| 3. | Leiga av høli | — 18.000,- |
| 4. | Innbúgv (bókakeyp, skrivstovuamboð o.a.) | — 20.000,- |
| 5. | Ljós, telefon, porto, lýsingar v.m. | — 15.000,- |
| 6. | Vikarsamsýningar | — 30.000,- |
| 7. | Løn til skrivstovufólk og aðrar skrivstovuútreiðslur | — 210.000,- |
| 8. | Niðurskurður av millumrokning við landskassan | — 230.000,- |
| | | kr. 1.600.000,- |
| | Ætlaður sølupeningur | — 600.000,- |
| | | kr. 1.000.000,- |

ad. 1. Í 1983/84 vórðu játtaðar 900.000,- kr., sama upphædd, sum grunnurin søkti um. Havandi í huga tær fíggjarliga krevjandi uppgávur, sum grunnurin er farin undir og fer undir í næstu framtíð, heldur nevndin tað vera rímuligt at søkja um 1.000.000,- kr. Útgávurnar, sum serliga verður hugsað um, eru: Lesibók til 3. skúlaár, 2.p.; Gud kallar teg; Føroyskr bókmentir í úrvali 3; Veien til førerkortet (umseting og tillaging); Føroyskar bókmentir í úrvali 4; Náttúrusøga til 9 ská.; Føroyskt atlass.

ad. 6. Í ávísum førum verður neyðugt at gjalda løn til vikar fyri at geva lærarum stundir at avgreiða handrit endaligt. Hetta gjald verður so roknað sum partur av samsýning fyri bókina.

ad. 7. Her verður hugsað um leyst, tímalønt hjálparfólk, tá ið á stendur at fáa avgreitt ymsar uppgávur viðv. handritum go skrivstovuarbeiði o.ø.

| Kontonummar og navn | Rokn-skapur | Játtan | Uppskot stovnsins | Uppskot landsstýrisins | Ætlan | Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1982 | 1983/84 | 1984/85 | 1984/85 | 1985/86<br>í 1.000 kr. | 1986/87<br>í 1.000 kr. |
| Føroya Skúlabókagrunnur | 1.306.100 | 900.000 | 1.000.000 | 1.000.000 | 1.100.0<br>(10%) | 1.210.0<br>(10%) |

*4. Yvirlit yvir ætlan fyri 1985/86 og 1986/87*

Fyri árini 1985/86 og 1986/87 er studningsumsóknin fyri 1984/85 framskrivað við 10% hækkan p.a. (si skjal I).

Umframt tær undir ad 1 í yvirliti yvir væntandi útreiðslur 1984/85 nevndu bøkur kann upplýsast her, at grunnurin hevur havt fyrispurningar um aðrar kostnaðarmiklar útgávur, sum á natúrligan hátt koma undir grunsins virksemi, t.d. eina Føroya søgu í fýra bindum.

Hesi framskrivaðu tøl mugu sostatt takast við fyrivarni.

**Føroya Skúlabókagrunnur**

*Kassaroknskapur 1. apríl 1982 - 31. mars 1983*

*Inntøkur*

| | |
|---|---|
| Bókamiðsølan avroknað í 1982/83 ..... | 590.000,00 |
| Løgtingsstundingur 1982/83 ..... | 700.000,00 |
| Nordisk Ministerråd, stuðul til útgávu av bókini »Liv og Daad — Store navne i vor egen tid: ..... | 10.000,00 |
| Bókadeild Føroya Lærarafelags ..... | 6.100,00 |
| | 1.306.100,00 |

*Útreiðslur*

Prentingar- og innbindingarútreiðslur, samsýningar og aðrar útreiðslur viðvíkjandi útgávu av:

| | |
|---|---|
| Alisfrøði III ..... | 74.350,00 |
| Læraramappur ..... | 3.340,00 |
| Næmingamappur ..... | 15.120,00 |
| Jim og ætt hansara | 11.350,00 |

| | |
|---|---|
| Ása fer í skúla og uppgávuhefti | 15.000,00 |
| Myndaorðabók til barnaskúlan | 1.164,80 |
| Lær at spæla I | 500,00 |
| Fuglanøvn — Ahlstrøm | 800,00 |
| Kort: Fiskileiðir undir Føroyum | 24.230,10 |
| Ein bygd í Ísrael | 34.280,00 |
| Eg skrivi I | 205.870,00 |
| Vit práta og tekna | 48.080,00 |
| Bygdamyndir Porkeri-Vág | 6.878,00 |
| Plantulæra | 3.545,00 |
| Føroyskar plantur í litum | 142.699,75 |
| Esops dømi | 20.000,00 |
| Protokollir | 8.500,00 |
| Ummælisbøkur | 28.350,00 |
| Mia og Dia | 67.670,50 |
| Áin | 82.661,75 |
| Tjóðskaparrørslutíðin | 7.660,00 |
| Íslendskir tekstir | 6.160,00 |
| Floyalsskaninin | 28.161,25 |
| Summardáin 2. útg. | 46.698,82 |
| Roknitalvur | 19.664,21 |
| Tung Two | 20.424,00 |
| Skogby | 19.779,00 |
| Skúlaskapur í Froðbiar sókn | 10.000,00 |
| Skr. føroyskt 5. ská. | 7.000,00 |
| Skr. føroyskt 7. ská. | 700,00 |
| Skr. føroyskt ? ská. | 32.600,00 |
| Les og svara arb. hefti 3. útg. | 6.130,00 |
| Verðaldarsøga II | 12.744,00 |
| Lesibók 2. ská. | 90.965,40 |
| Lesibók III 2. partur | 11.000,00 |
| Guð kallar teg | 26.304,00 |
| Ung i Norden | 31.300,00 |
| Lívfrøði 9. ská. | 66.000,00 |
| Nú er tann stundin komin | 344.961,00 |
| Náttúrusøga 9. ská. | 7.320,85 |
| Luthers stóra katekismus | 5.500,00 |
| Royndarhefti til Alisfrøði 2 | 77.336,00 |
| Lív og brøgd II | 58.025,00 |

**Føroya Skúlabókagrunnur**

*Kassaroknskapur 1. apríl 1982 - 31. mars 1983*

| | | |
|---|---|---|
| *Umsitingarútreiðslur* | | |
| Skrivara- og kassameistaraløn | 18.000,00 | |
| Aðrar lønir | 154.355,89 | |
| Fundir og ferðapeningur | 17.701,00 | |
| Lýsingar | 7.050,00 | |
| El og telefon | 5.738,00 | |
| Leiguútreiðslur | 14.400,00 | |
| Postgjald | 5.000,00 | |
| Annað | 20.214,29 | 242.459,18 |
| *Rentur* av sparikassaláni | | 6.558,71 |
| MUNUR (kassahall) | | ÷673.741,32 |
| | | 1.306.100,00 |

*Ognarroknskapur (status) 31. mars 1983*

*Ogn*

| | |
|---|---|
| Bøkur á goymslu hjá Bókamiðsøluni | |
| samb. yvirlit | 6.929.042,19 |

*Skuld*

Kassakredittur í Føroya Sparikassa:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Saldo 1. apríl 1982 | | ÷37.995,33 | |
| Innsett í 1982/83 | | 601.100,00 | |
| | | 639.095,33 | |
| Hevað í 1982/83 | 837.995,33 | | |
| Rentur í 1982/83 | 6.558,71 | 844.554,04 | 205.458,71 |

Millumrokning við landskassan:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Saldo 1. apríl 1982 ..... | | 2.258.109,61 | |
| Útlagt í 1982/83 ..... | | 1.973.335,13 | |
| | | 4.231.444,74 | |
| Landskassastudningur.. | 700.000,00 | | |
| Inngjøld ..... | 843.047,85 | 1.543.047,85 | 2.688.396,89 |
| *Munur* (eginogn) ..... | | | 4.035.186,59 |
| | | | 6.929.042,19 |

*Viðmerkingar*

1. Óavroknað søla hjá Bókanmiðsøluni pr. 31. mars 1983 er ikki tikin við í roknskapin, heldur ikki sum bøkur á goymslu.

2. Útgjaldingar fyri bøkur, sum eru í umbúna, eru tiknar við sum ogn í roknskapinum.

*Viðvíkjandi landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð*

*Sbrt. skriv dagf. 12. nov. 1983 frá skúlabókasavnsfelagnum:*

Hervið heitir Skúlabókasavnsfelagið á Føroya Landsstýri um at skipa so fyri, at landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð kemur á komandi løgtingsfíggjarlóg, tí vit meta, at ógvuliga stórur tørvur er á hesum stovni, sum skal ráðgeva og samskipa skúlabókasøvnini, sum fleiri staðni longu eru komin, og sum fyri ein part ikki fáast at virka eftir ætlan, tí landsmiðstøðin fyri undirvísingaramboð enn ikki er sett á stovn.

**Ad. § 15 - 15907/323124 Norðurlandahús, i grunn**

*Sbrt. skriv dagf. 6. apríl 1983 frá Nordisk Ministerråd:*

*Ang. budget 1984 och styrelse för Nordens Hus på Färöarna*

Med hänvisning til §12 i stadgarna för Nordens Hus på Färöarna meddelas härmed följandi beslut i Nordiska ministerrådet (kultur- och undervisningsministrarna) vid möde 25.2.1983:

»I enlighet med *bilaga 2* samt under förutsättning av godkännande vid nationell parlamentarisk behandling (jfr det nordiska budgetreglementet, §5) och beträffande Nordens Hus på Färöarna godkännande af Färöarnas landsstyre *beslutades* fastställa den nordiska kulturbudgeten för 1984 — som driftbudget i 1982 års lönnivå — till 125.618.000 danska kronor under konstaterande av

*att* intäkterna budgeterats till 7.491.000 danska kronor,

*att* de skilda ländernas finansieringsandelar därmed sammanlagt udgör 118.127.000 danska kronor,

*att* det för löne-, pris- och valutajustering beräknade beloppet avser sådana lag-, avtals- eller i övrigt beslutsfästa ökningar som under budgetåret kompenseras samt

*att* de skilda ländernas bidrag till kulturbudgeten för 1984 skulle utgå enligt tidigare beslutade fördelningsnyckel (jfr MR 5/82 punkt 7.5).

*Beslutades* bemyndiga ämbetsmannakommittén att utfärda riktlinjer för de enskilda anslagens utnyttjande.«

Som av sammanfattningen framgår utgör anslaget till Nordens Hus på Färöarna 5.125.000,00 dkr., varvid den totala budgetramen 1984 enligt §12 i stadgarna uppgår til 5.570.000 dkr. Det är ministerrådets förhoppning att Landsstyret kan godkänna denna budgetram och för sin del bevilja ett anslag på 445.000 dkr.

*Sbrl. skriv dagf. 9. nov. 1983:*

*Nordens Hus på Færøerne*

På mødet den 15.9.1983 med landsstyremand Tórbjørn Poulsen blev det aftalt, at styringsgruppen for Nordens Hus på Færøerne medio november måned skulle fremkomme med en præliminær beregning af de endelige udgifter for opførelsen af Nordens Hus som grundlag for endelig bevillingsanvisning. Samme beslutning traf Nordisk Ministerråd (undervisnings- og kulturministrene) ved sit møde 26.9.1983.

Styringsgruppen anmoder herved Landsstyret om, indtil videre at anvende denne præliminære udgiftsberegning i forbindelse med bevillingsanvisningen til projektet. Når endeligt byggeregnskab foreligger, vil Landsstyret selvsagt modtage underretning herom.

---

Styringsgruppen for
NORDENS HUS PÅ FÆRØERNE
Sekretariatet for nordisk
kulturelt samarbejde

1.11.1983 NV/mn

660-2-12

*Nordens Hus på Færøerne — præliminær udgiftsberegning*

Ved Mr 5/83 den 26.9.1983 besluttedes at anmode styringsgruppen for Nordens Hus på Færøerne om inden fire uger at fremkomme med en præliminær beregning af den endelige udgifter for projektet som underlag for den endelige bevillingsanvisning.

Siden denne beslutning har projektets arkitekt ført forhandlinger med de implicerede entreprenører om slutsummerne for den enkelte entrepriser. Disse forhandlinger er tilendebragt for de fleste entrepriser svarende til ca. to tredjedele af den samlede budgetpost for byggeri og indretning. Der resterer således fortsat en mindre usikkerhed med hen-

syn til slutsummerne for den sidste tredjedel under denne post, men forhandlingerne herom pågår og forventes afsluttet inden for kort tid. Med reservationer for resultatet af disse forhandlinger må den samlede udgift til posten byggeri og indretning herefter antages at blive 44,5 mill. dkr. I denne sum er inkluderet det beløb på 300.000 dkr., som Ministerrådet ved mødet den 26.9.1983 bemyndigede styringsgruppen til at anvende til sådanne bygnings- og indretningsforanstaltninger, der som valge af arkitektens handlinger ligger uden for entreprenørernes ansvar, men som kræves for projektets færdiggørelse.

Budgetposten på ca. 10 mill dkr. til teatertcknisk udrustning grunder sig på nøje forhandlinger med den enkelte entreprenører og leverandører og skulle således ikke give anledning til større udsving.

Af den anførte post på ca. 14,9 mill dkr. til generelle projektomkostninger udgør ca. to tredjedele honorarer til projekteringsgruppen og øvrige konsulenter. Disse honorarer er procentvis afledt af selve byggesummen, og en endelig beregning heraf kan derfor først foretages i forbindelse med det endelige byggeregnskabs færdiggørelse. Det vil sige, at i det omfang, der er usikkerhed med hensyn til byggesummen, forplanter denne usikkerhed sig til honorarsummerne. Der må således også vedr. denne post tages et mindre forbehold.

Den resterende tredjedel af de generelle projektomkostninger vedrører udgifter til projektledelse, trykning og kopiering af bl.a. tegninger, samt møde- og rejseomkostninger. Dette sidste led har naturligvis en betydelig større vægt i dette projekt, end det ville have haft i et rent nationalt projekt. Dertil kommer, at de sidste måneders vanskelige projekt- og administrationsforhold har nødvendiggjort et betragteligt antal styringsgruppemøder, som selvsagt ikke var budgetteret ved projektets start. Først når projektet er endeligt afsluttet og alle forhandlinger med entreprenører og projekterende tilendebragt, kan det slutteligе mødebehov opgøres.

Med de ovennævnte forbehold kan projektets totaludgift præliminært opgøres således:

| | |
|---|---|
| Generelle projektomkostninger | 14.900.000 dkr. |
| Byggeri og indretning | 44.500.000 - |
| Teaterteknisk udrustning | 10.000.000 - |
| | 69.400.000 dkr. |

I denne sum er også inkluderet de færøske told- og importafgifter, idet aftalen med de færøske myndigheder har været, at disse afgifter skulle betales af entreprenører og leverandører ved varernes indførsel til Færøerne, hvorefter de betalte beløb ville blive refunderet projektet som et led i den færøske betalingsdel.

Ved byggeriets start beregnede man på grundlag af dagældende toldsatser, at tolden ville udgøre ca. 12% af projektets samlede udgifter i daværende prisniveau(september 1980). Siden da er de generelle toldsatser sat betydeligt op, hvilket alt andet lige skulle betyde, at den færøske finansieringsdel i form af toldrefusion nu skulle udgøre noget mere end 12% af den antagne totaludgift på 69,4 mill dkr. Da imidlertid en del af projektets udgiftsforøgelse [illegible] de generelle projektomkostninger, som jo er omfattet [illegible] toldrefusion, og da den endelige [illegible] alle udgifter er afholdt og dermed al told refunderet, vil den i den følgende beregning af udgiftsfordelingen blive gået ud fra, at tolden fortsat udgør ca. 12% af projektets samlede udgifter som ved byggestart. Såfremt den betydelige toldstigning i byggeperioden også kommer til at slå væsentligt igennem på dette projekt, vil dette således betyde, at den færøske betalingsdel, der så at sige forlods udredes i form af toldrefusion, bliver højere end de anførte ca. 12%, hvorved den resterende udgift til deling mellem MR og FL (med aftalt henholdsvis 82,75% og 17,25%) vil blive tilsvarende lavere.

Med dette udgangspunkt vil finansieringsbehovet til dækning af projektets forventede totaludgift kunne beregnes på følgende måde:

| | |
|---|---|
| Forventet totaludgift | 69.400.000 dkr. |
| — heraf toldrefusion ca. 12% | 8.328.000 - |
| Restbeløb | 61.072.000 dkr. |
| der som aftalt deles | |
| med 17,25% til FL = | 10.534.920 - |
| og 82,75% til MR = | 50.537.080 - |

der igen deles mellem landene således:

| | | |
|---|---|---|
| DK | 23,7% = | 11.977.287 |
| Fi | 16 % = | 8.085.933 - |
| Is | 0,9% = | 454.834 - |
| No | 18 % = | 9.096.674 |
| Sv | 41,4% | 20.922.354 |
| Totalt MR | | 50.537.080 dkr. |
| Totalt FL: 8.328.000+ 10.534.920= | | 18.862.920 dkr. |

Der kan sammenlignes med følgende oversigt over indbetalinger [illegible] ske er ganske identisk [illegible]

| | |
|---|---|
| DK | 10.456.453 dkr. |
| Fi | 7.502.000 |
| Is | 423.000 |
| No | 8.392.000 |
| Sv | 19.340.560 - |
| FL ex told | 9.616.000 - |

Hvordan denne forventede totaludgift forholder sig til bevillingsrammen, vil fortsat ikke kunne endeligt fastslås. Som anført i sekretariatets notat af 24.8.1983 (MR 5/83 pkt. 5.1) består denne ramme i en fremregning af det konstaterede budget ved byggestart med det besluttede indeks til byggeriets økonomiske tyngdepunkt. Endelig konstatering af dette tyngdepunkt vil først kunne foretages i forbindelse med aflæggelse af endeligt byggeregnskab, når projektets absolutte udgift er kendt. Der er således ikke på nuværende tidspunkt grundlag for justeringer i forhold til notatet af 24.8.1983, i hvilket man præliminært beregnede bevillingsrammen for MRs og FLs andele, men excl. told, til 58,4-58.9 mill dkr.

Sammenfatningsvis må det konkluderes, at den foretagne beregning er behæftet med nogen usikkerhed, men at risikoen for højere udgifter end beskrevet forekommer lidet sandsynlig.

---

*Viðmerkingar landsstýrisins:*

| | | |
|---|---|---|
| **Bygging tilsamans** | 69.500.000 | kr. |
| ca. 12% tollafturrindan | 8.328.000 | - |
| | 61.072.000 | kr. |
| Føroya Landsstýri 17,25% | 10.534.920 | - |
| Goldið higartil | 9.616.000 | - |
| Rest | 918.920 | kr. |

*Uppskot landsstýrisins:*

| | | |
|---|---|---|
| Í grunn 1984/85 | 920.000 | kr. |
| til rakstur | 445.000 | - |
| Tilsamans | 1.365.000 | kr. |

**Ad § 15 - 15907/323149 Fornminnissavn í grunn**

*Sbrt. skriv dagf. 10. oktober 1983:*

Føroya Fornminnissavn hevur áður í mongum skrivum gjørt vart við hølisviðurskifti savnsins og tørvin á nýggjum fornminnasavni at hýsa forngripum okkara her í landinum. Grundgevingarnar fyri byggjan av nýggjum fornminnasavni skulu ikki verða endurtiknar her, men eg fari at loyva mær at vísa til ein ávísan part av málinum.

Í 1977 gjørdi Føroya Landsstýri avtalu við donsku stjórnina um avheudan av stóra savninum av føroyskum forngripum, íroknað stólavangarnar úr Kirkjubø, sum finst á Danmarks Nationalmuseum. Málið um avhendanina er avgreitt, sum eg skilji tað, og avhendanin sjálv kann verða framd, tá vit hava uppfylt tær treytir, sum settar vórðu í avtaluni, og sum miðja ímóti at nevndu forngripir verða ikki goymdir og framsýnaðir undir verri umstøðum her heima enn í Danmark. Avtalan sigur tí, at gripirnir verða avhendaðir, tá nýtt fornminnasavn er bygt.

Ein beinleiðis avleiðing av gjørdu avtaluni var, at landsstýrið tók fyrsta stigið til byggjan av nýggjum fornminnasavni við at seta á stovn grunn til endamálið. Veitingarnar í grunnin hava verið

| | | |
|---|---|---|
| 1978/79 | kr. | 500.000 |
| 1979/80 | - | 200.000 |
| 1980/81 | - | 400.000 |
| 1981/82 | - | 200.000 |
| 1982/83 | - | 200.000 |
| 1983/84 | - | 200.000 |

og ætlanin fyri komandi árini er

| | | |
|---|---|---|
| 1984/85 | - | 200.000 |
| 1985/86 | - | 200.000. |

Sum tað sæst byrjaði grunnurin við eini veiting uppá kr. 500.000, eitt tal, sum — hevði tað verið viðgjørt í mun til minkanina í peningavirði — í dag hevði táttað upp móti milliónini. Í staðin er sjálvt talið vorðið lækkað so nógv, at árliga veitingin nú bert kann metast at vera eitt eiti.

Nú størri greiði er fingin á framtíðarviðurskiftum stovnsins og byggilendi m.a. er fingið til vega, fari eg at loyva mær at skjóta upp, at málið um byggjan av nýggjum fornminnasavni nú verður tikið upp til realitetsviðgerðar, og at m.a. veitingarnar í byggigrunnin verða munandi øktar. Í hesum sambandi skal eg loyva mær at vísa til, at seinru árini hevur í aðrari almennari mentanarbygging kt.nr. 15907/323124: Norðurlandahús í grunn, verið tikið øðrvísi ríviliga til.

Her hevur talan verið um árligar milliónveitingar og verandi fíggjarár eru játtaðar kr. 5.770.000 á hesi konto. Byggingin av Norðurlandahúsi er nú lokin og veitingarnar til byggigrunnin verða tí at steðga. Raksturin 1984/85 verður mettur til kr. 265.000. Her verður sostatt ein upphædd umf. kr. 5.500.000 frígjørd á mentanarøkinum, og fari eg at loyva mær at skjóta upp, at henda upphædd verður sett í fornminnasavnsgrunnin, so tað av álvara kann vera farið undir at hugsa um fyrireikan til byggingina.

## Ad § 15 - 15907/323165 Rakstur av Bókamiðsøluni

*Sbrt. skriv dagfest 27. september 1983:*

| Kontonummar og navn | Rokn-skapur | Játtan | Uppskot stovnsins | Uppskot landsstýrisins | Ætlan | Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1982 | 1983/84 | 1984/85 | 1984/85 | 1985/86 | 1986/87 |
| | | | | | í 1.000 kr. | í 1.000 kr. |
| Sølugjald 10% av netto | 118.480,62 | | 95.000 | | 105.0 | 125.0 |
| Studningur úr landskassanum | 220.000,00 | 250.000,00 | 315.000 | 275.000 | 353.0 | 382.0 |
| Renta | 11.192,80 | | 10.000 | | 10.0 | 10.0 |
| Lønir | 172.045,55 | | 192.000 | | 192.0 | 192.0 |
| Húsaleiga | 122.847,90 | | 140.000 | | 154.0 | 159.0 |
| Skrivstovuútreiðslur | 13.767,30 | | 15.200 | | 16.8 | 18.2 |
| Príslistar | 12.220,00 | | 14.000 | | 15.4 | 16.9 |
| Koyring, farmagj. og porto | 13.484,15 | | 14.800 | | 16.3 | 18.2 |
| Trygging | 11.757,00 | | 12.800 | | 14.1 | 15.5 |
| Revisión | 8.400,00 | | 9.200 | | 10.3 | 11.4 |
| Telefon | 1.299,00 | | 1.500 | | 1.65 | 1.8 |
| Húsaútreiðslur | 12.408,80 | | 16.000 | | 17.6 | 19.2 |
| Ymiskt | 12.315,39 | | 4.000 | | 5.0 | 6.0 |
| Rakstraravlop | ÷30.872,72 | | ÷ 500 | | +0.75 | +0.78 |
| Avskriving uppá innbúgv | 8.000,00 | | 7.000 | | 6.5 | 6.0 |
| Ársúrslit | ÷38.872,27 | | ÷6.500 | | ÷5.75 | ÷5.22 |

| Heiti | Lønarflokkur ella líknandi | Tal av størvum: Játtað á fíggjarlóg | Tal av størvum: Søktar nýjáttanir | Tal av størvum: tilsamans søkjast | løn |
|---|---|---|---|---|---|
| (1) | (2) | (3) | (4) | (5) = (3) + (4) | (6) |
| Starvsfólk | 1 | | | | 160.384 |
| Tímalønt (vask.) | 1 | | | | 11.000 |
| Næmingar: | | | | | |
| 2 tímar pr. dag | 1 | | | | 19.080 |

Roknskapurin til skjals a Landsskrivstovuni.

*Viðmerking frá landsskrivstovuni:*

Játtaðar verða 275.000 kr. til rakstur av bókamiðsøluni.

**Ad § 15 - 15907/323173 Orðabókaútgáva, í grunn**

*Sbrt. skriv dagf. 5. oktober 1983:*

Vísandi til skriv landsstýrisins, dagf. 11.9.83 — F.jr.nr. 400-36, senda vit hjálagt skjal í við umsókn 84/85 og ætlan 85/86 og 86/87 fyri KF 15907, kt. 323173: Orðabókaútgáva í grunn (44018-663057).

Felagið loyvir sær at vísa til skriv 11.10.82 sent landsstýrinum í samband við uppskot til fíggjarløgtingslóg 1983/84. Her kann verða lagt aftrat, at enska-føroyska orðabókin, sum hevur verið í gerð í meira enn 10 ár, er nú í prenti. Útgávukostnaðurin — 5.000 eintøk - - togar upp ímóti 300.000 kr. Felagið søkir um studning til útgávuna frá peningastovum, privatum fyritøkum og feløgum. Tó er at vænta, at neyðugt verður at fíggja umleið helvtina úr landskassagrunninum, har tøki peningurin, eftir at játtanin 83/84 er flutt, verður 234.000 kr. Her er tó alt fyri eitt at viðmerkja, at felagið er farið undir at fyrireika nýútgávu av føroysku-donsku og donsku-føroysku orðabókunum. *1977-útgávan* verður uppseld um eitt ár ella so. Kostnaður av henni, tils. 10.000 fotoprentað eintøk, *var* 250.000 kr.

Ein nýggj útgáva av nevndu orðabókum verður mett til 400.000 kr. við galdandi prislegu.

Tað er eyðsýnt, at uttan munandi peningajáttan verður felagið ikki ført fyri at fremja útgávuætlan sína.

| Kontonummar og navn | Rokn-skapur | Játtan | Uppskot stovnsins | Uppskot lauds-stýrisins | Ætlan | Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1982 | 1983/84 | 1984/85 | 1984/85 | 1985/86 | 1986/87 |
| | | | | | í 1.000 kr. | í 1.000 kr. |
| Orðabók í grunn (44010-663257) | 75.000 | 90.000 | 100.000 | 100.000 | 150.0 | 75.0 |

*Umsókn* 1984/85 100.000, til føroysk-danska og dansk-føroyska orðabók.

*Ætlan:*
1985/86: 350.000, til føroysk-danska og danska-føroyska orðabók.
1986/87: 75.000, til framhaldandi útgávuna.

**Ad § 15 - 15907/323228 Mentunnargrunnurin (MFL)**

*Sbrt. skriv dagf. 28. okt. 1983:*

Í brævi dagfest 11. august 1983 (F.L.j.nr. 400/36) biður landsstýrið grunnin um at gera uppskot til fíggjarlogtingslóg fyri 1984/85 viðvíkjandi konto 11276 (Mentunargrunnur Føroya Logtings).

Vísandi til hetta verður skotið upp, at játtaðar verða 350.000 kr. tilgrunsins, soleiðis at 80.000 kr. verða settar av til stovnsfæið hjá grunninum og restin 270.000 kr. verða at nýta til studning til bókaútgávu, rakstrarútreiðslur, útgávu av Fróðskaparritinum og øðrum ritum, sum grunnurin hevur bundið seg til at geva út, av tí at tað verður at hesi rit hava stóran mentunarligan týdning. Somuleiðis verður neyðugt at nýta pening til tess at minka um saldoina, sum grunnurin stendur í debet í millumrokning við landskassan.

Tá ið grunnurin er komin í debet í millumrokningini við landskassan, stendst hetta fyrst og fremst av, at talið á umsóknum hevur verið støðugt vaksandi hesi seinastu árini og útgávan av bókum hevur eisini alt dýrari, so tann peningur, ið higartil hevur verið játtaður, hevur rokkið alt ov stutt, og tryslið á grunnin verður ikki minni sum tíðin ur.

Fyri fíggjarárini 1985/86 og 1986/87 metir stýrið kortini, at 200.000 kr. fara at vera nóg mikið fyri hvørt av fíggjarárunum, um 350.000 kr. verða játtaðar fyri komandi fíggjarár.

Til lánigrunnin fyri bókaútgávu skjýtur stýrið upp at játta 100.000 kr.

*Viðmerkingar landsstýrisins:*

Roknskapurin til skjals á Landsskrivstovuni.

**Ad § 15 - 15907/323236 Føroya Listasavn**

*Sbrt. skriv dagf. 1. oktober 1983:*

Veitingin 1983/84 var *150.000 kr.*. Biðið verður um, at veitingin 1984/85 verður tann sama.

Viðvíkjandi ætlanum fyri 1985/86 og 86/87 verður vist til tilmæli Listafelagsins, Listasavnsins og Listasavnsins um samskipan av Listasavninum og Listaskálanum til *ein* stovn, ið hevur *eina* fíggjarætlan. Úrslitið hevði eftir meting stovnanna verið møguleiki fyri skilabetri prioritering eftir tørvi.

*Viðmerking frá landsstýrinum:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtaðar verða | 150.000 kr. | til rakstur av listaskálanum |
| | 125.000 kr. | til Listasavnið til keyp av nýggjari og eldri list |
| | kr. 275.000 | |

**Ad § 15 - 15905/323252 Føroyskt-íslendskt samstarv**

Í samband við, at Norðurlandahúsið var tikið í nýtslu 1. apríl 1983 handaði Ísland føroyingum gávu, sum var at umleið 50.000 kr. vórðu settar av á íslendsku fíggjarlógina til føroyskt-íslendskt samstarv.

50.000 kr. eru sostatt settar av á íslendska fíggjarlógaruppskotinum fyri 1984, sum ikki er samtykt enn.

Landsstýrið skjýtur upp at seta 50.000 kr. á fíggjarlógina fyri 1984/85 at nýta saman við teim 50.000 kr. á íslendsku fíggjarlógini, um tær verða játtaðar til føroyskt/íslendskt samstarv.

**Ad konto § 15 - 15907/37305 Landsstýrinum at ráða yvir**

*Sbrt. skriv agf. 22. november 1983 frá Vestre Kirkegårds Kontor:*

I henhold til aftale fremsendes herined opgørelse over Udgifterne ved udvidelse og etablering af den færøske begravelsesplads på Vestre kirkegård i København.

| | | |
|---|---|---|
| Erhvervelse af 110 gravsteder 1984-2004 | 72.600,- | kr. |
| Fornyelse af 43 gravsteder, forskellige åremål, alle til år 2004 incl. | 17.622,- | - |
| Fornyelse af 23 gravsteder på den tidligere udvidelse af færøsk afdeling, samt 3 tilstødende gravsteder, i 1 år til år 2004 incl. | 759,- | - |
| | 90.981,- | kr. |
| Beplantningsarbejder i forbindelses med udvidelse af afdelingen | 6.478,- | kr. |
| Flytning af hovedmonumentet | 3.996,- | - |
| | 101.455,- | kr. |
| Anslået udgift afdelingens gartneriske pasning i 1984 ca. | 17.000,- | kr. |
| I alt incl. 22% moms | 118.455,- | kr. |

Ovenstående opgørelse er udregnet på grundlag af, at indbetaling af beløbet foretages i april - maj måned 1984.

Det er påregnet at den færøske afdeling, når den til sin tid bliver fuldt udbygget, kommer til at omfatte 204 gravsteder. På nuværende tidspunkt henligger 28 gravsteder som er erhvervet af andre gravstedsejere, men så snart disse gravstedsejere ikke længere ønsker at bevare brugsretten til deres gravsteder, vil disse blive overført til færøsk afdeling.

Den gartneriske pasning af gravstederne er kun angivet som et anslået beløb, idet vi, efter samtaler med repræsentanter for den færøske afdeling mener, at det vil medføre en mere rimelig afregning, af de faktiske udgifter til pasningen, når det drejer sig om et større samlet areal, som det vil blive tilfældet, når udvidelsen er foretaget.

Skulle betalingen foretages efter reglerne for enkeltgravsteder, ville beløbet, med det aktuelle antal gravsteder, og de nugældende takster, blive 26.620,- kr., altså væsentlig over de anslåede 17.000,- kr.

*Viðmerking landsstýrisins:*

Skotið verður upp, at upphæddin 102.500 kr., har meginparturin er ein einaferð-útreiðsla, verður sett á konto 15907/373305: Landsstýrinum at ráða yvir.

Uppskot landsstýrisins er, at settar verða 300.000 kr. á konto 15907/373305: Landsstýrinum at ráða yvir.

**Ad § 16 - 16018 Vrakarastovnurin**

*Sbrt. skriv dagf. 24. november 1983:*

Visandi til skriv landsstýrisins dagfest 11. august 1983 (L.T.-nr. 400-34) verður hjálagt sent uppskot til fíggjarløgtingslog fyri 1984/85 fyri *Vrakarastovnin*.

Roknskapartølini fyri 1982/83 og játtanin fyri 1983/84 eru uppsett til sammetingar.

Bls. 585 — 592

burturtiknar vegna feil í prentingini, sí bls. 752A — H.

| Kontonummar og navn<br>16018 Vrakarastovnurin | Rokn-skapur | Játtan | Uppskot stovnsins | Uppskot landsstýrisins | Ætlan | Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1982 | 1983/84 | 1984/85 | 1984/85 | 1985/86<br>í 1.000 kr. | 1986/87<br>í 1.000 kr. |
| 103048 Løn tænastumenn | 1.266.000 | 1.340.000 | 1.430.000* | 1.400.000 | 1.400.0 | 1.400.0 |
| 103151 Løn avloysarar | 208.000 | 127.000 | 185.000 | 185.000 | 185.0 | 185.0 |
| 113202 Ferða- og dagp. innanlands | 127.000 | 165.000 | 165.000 | 165.000 | 165.0 | 165.0 |
| 113243 Ferða- og dagp. uttanlands | — | — | — | — | — | — |
| 213806 Leiguútgreiðslur | 32.250 | 40.000 | 52.000 | 52.000 | 52.0 | 52.0 |
| 233259 Postgjald | 1.750 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.0 | 3.0 |
| 233354 Telefon og telex | 21.150 | 35.000 | 45.000 | 45.000 | 45.0 | 45.0 |
| 233561 Aðrar skrivstovuútreiðslur | 58.600 | | | | | |
| a) elektr. mátitól | | 60.000 | 60.000 | 60.000 | 60.0 | 60.0 |
| b) skeiðvirksemi/roterin | | 30.000 | 80.000 | 80.000 | 80.0 | 800 |
| c) bilurin | | 20.000 | 20.000 | 20.000 | 20.0 | 20.0 |
| | 1.714.750 | 1.820.000 | 2.040.000 | 2.040.000 | 2.040.0 | 2.040.0 |

*) 1 yvirvrakari og 8 vrakieftirlitsmenn + 1 vrakieftirlitsmann fyri Sandoy.

**Ad § 16 - 16104 Nautiskt Royndarkamar**

*Sbrt. skriv dagf. 7. okt. 1983:*

Vísandi til bræv tygara J. nr. 400-36 viðvíkjandi uppskoti til fíggjarløgtingslóg 1984/85, skal hervið sigast frá, at útreiðslur Nautisk Royndarkamars eru mettar til:

| | Rokn-skapur | Játtan | Uppskot stovnsins | Uppskot landsstýrisins | Ætlan | Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1982 | 1983/84 | 1984/85 | 1984/85 | 1985/86 | 1986/87 |
| | | | | | í 1.000 kr. | í 1.000 kr. |
| Samsýning | 6.600,00 | 6.600,00 | 6.600,00 | 6.600 | 6.6 | 6.6 |
| Rakstrarútreiðslur | 3.133,00 | 6.000,00 | 5.000,00 | 5.000 | 5.0 | 5.0 |
| Viðlíkahald av reiðskapi | 29.335,25 | 3.000,00 | 6.000,00 | 6.000 | 6.0 | 6.0 |
| Postgjald | 344,00 | 1.000,00 | 500,00 | 500 | 0.5 | 0.5 |
| Tilsamans | 38.724,25 | 16.600,00 | 17.100,00 | 17.100 | 17.0 | 17.0 |

**Ad § 16 - 16208/373106 Sjómansheim**

*Sbrt. skriv dagf. 29. sept. 1983 frá Kirkjuliga missiónsfelagið:*

Vísandi til skriv tykkara dagfest 11. august í ár, skulu vit við hesum siga frá, at vit høvdu verið Landsstýrinum takksamir, um vit eins og undanfarin ár kundu fingið stuðul á figgjarlógini til arbeiði okkara millum sjómenn.

Umsókn frá Hini føroysku sjómansmissiónini:

Kr. 80.000,- til sjómansheimið Lívd í Føroyingahavnini
- 10.500,- til arbeiðið í Reykjavík, Lerwick og Hirtshals.
Tils. kr. 90.500,-

*Viðmerkingar landsstýrisins:*

| | |
|---|---|
| Hin føroyska sjómansmissiónin | kr. 90.500,00 |
| Kirkjuliga missiónsfelagið | - 10.500,00 |
| Bygging av sjómansheimi í Reykjavík | - 39.000,00 |
| | kr. 140.000,00 |

**Ad § 16 - 16208/373106 Sjómansheim**

*Sbrt. skriv dagf. 29. sept. 1983 frá Kirkjuliga missiónsfelagið:*

Vísandi til skriv tykkara dagfest 11. august í ár, skulu vit við hesum siga frá, at vit høvdu verið Landsstýrinum takksamir, um vit eins og undanfarin ár kundu fingið stuðul á fíggjarlógini til arbeiði okkara millum sjómenn.

Umsókn frá Hini føroysku sjómansmissiónini:

Kr. 80.000,- til sjómannaheimið Lívd í Føroyingahavnini
- 10.500,- til arbeiðið í Reykjavík, Lerwick og Hirtshals.

Tils. kr. 90.500,-

*Viðmerkingar landsstýrisins:*

| | |
|---|---|
| Hin føroyska sjómansmissiónin | kr. 90.500,00 |
| Kirkjuliga missiónsfelagið | - 10.500,00 |
| Bygging av sjómannaheimi í Reykjavík | - 39.000,00 |
| | kr. 140.000,00 |

**Að § 16 - 16301 Vaktar- og bjargingartænastan**

*Sbrt. skriv dagf. 17. oktober 1983:*

| **Fíggjarætlan fyri Vaktar- og Bjargingartænastuna** | **Uppskot stovnsins** | **Uppskot landsstýrisins** | **Ætlan** | **Ætlan** |
|---|---|---|---|---|
| | **1984/85** | **1984/85** | **1985/86** í 1.000 kr. | **1986/87** í 1.000 kr. |
| Rakstrarstað 16301: Skrivstovan | ÷131.730 | ÷161.730 | ÷161.730 | ÷161.730 |
| Rakstrarstað 16315: Tjaldrið | 8.285.588 | 8.255.588 | 8.255.588 | 8.255.588 |
| Rakstrarstað 16334: Ólavur Halgi | 7.874.158 | 7.844.158 | 7.844.158 | 7.844.158 |
| | 16.028.016 | 15.938.016 | 15.938.016 | 15.938.016 |

**Fíggjarætlan fyri Vaktar- og Bjargingartænastuna 1984/85**

*Rákstrarstað 16301: Skrivstovan*

| Kontonummar og navn | | Roknskapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýris. 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 83904 | Ymiskar inntøkur | 1.600.000,00 | 1.700.000 | 2.000.000 | 2.000.000 | 2.000.0 | 2.000.0 |
| 83945 | Søla av sjókortum | 11.840,00 | | | | | |
| 103048 | Løn - tænastumenn | 281.516,94 | 262.450 | 291.270 | 291.270 | 291.3 | 291.3 |
| 103143 | Løn - starvsfólk | 188.095,26 | 186.570 | 193.000 | 193.000 | 193.0 | 193.0 |
| 103405 | Úrtíðarløn | | | 10.000 | 10.000 | 10.0 | 10.0 |
| 113202 | Ferða- og dagp. innanl. | 1.343,10 | 2.000 | 3.000 | 3.000 | 3.0 | 3.0 |
| 113243 | Ferða- og dagp. uttanl. | | 10.000 | 20.000 | 0 | 0 | 0 |
| 123103 | Skeið | | 20.000 | 30.000 | 20.000 | 20.0 | 20.0 |
| 203212 | Prenting av sjókortum o.a. | 36.010,85 | | | | | |
| 213105 | El, hiti, vask | 41.833,93 | 45.000 | 50.000 | 50.000 | 50.0 | 50.0 |
| 213806 | Húsaleiga | 86.290,00 | 88.000 | 95.000 | 95.000 | 95.0 | 95.0 |
| 233051 | Innbúgv | | 5.000 | 10.000 | 10.000 | 10.0 | 10.0 |
| 233155 | Prentlutir | 2.068,00 | 2.500 | 6.000 | 6.000 | 6.0 | 6.0 |
| 233353 | Telefon og telex | 47.494,70 | 85.000 | 90.000 | 90.000 | 90.0 | 90.0 |
| 253339 | Leiga av førum | 476.181,85 | 500.000 | 600.000 | 600.000 | 600.0 | 600.0 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 253873 | Helikoptara-sløkkiútgerð | 96.741,89 | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.0 | 50.0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 27.961,31 | 30.000 | 40.000 | 40.000 | 40.0 | 40.0 |
| 253969 | Aldumátarar | 157.850,45 | 250.000 | 200.000 | 200.000 | 200.0 | 200.0 |
| 333153 | Veðurprogram | 33.171,05 | 35.000 | 45.000 | 45.000 | 45.0 | 45.0 |
| 253985 | Bjargingarfeløg | 40.764,35 | 135.000 | 135.000 | 135.000 | 135.0 | 135.0 |
| | | ÷ 94.466,32 | ÷ 6.520 | ÷ 131.730 | ÷ 161.730 | 161.7 | 161.7 |

**Figgjarætlan fyri Vaktar- og Bjargingartænastuna 1984/85**

*Rakstrarstað 16315: »Tjaldrið«*

| Kontonummar og navn | | Roknskapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýris. 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 83904 | Inntøkur | 920.265,03 | | | | | |
| 103143 | Løn - starvsfólk | 3.179.660,53 | 3.364.876 | 3.484.338 | 3.484.338 | 3.484.3 | 3.484.3 |
| 103151 | Løn - avloysarar | 131.728,40 | 80.000 | 130.000 | 130.000 | 130.0 | 130.0 |
| 103405 | Løn - úrtíðarløn | 3.817,46 | 20.000 | 40.000 | 20.000 | 20.0 | 20.0 |
| 123103 | Skeið | 0,00 | 30.000 | 40.000 | 30.000 | 30.0 | 30.0 |
| 213702 | Ognar- og vanlukkutrygg. | 291.442,00 | 315.000 | 315.000 | 315.000 | 315.0 | 315.0 |
| 253107 | Kostur, búnyttur, vask | 203.446,47 | 285.000 | 310.000 | 310.000 | 310.0 | 310.0 |
| 253306 | Nav. amboð | 200.506,50 | 100.000 | 150.000 | 150.000 | 150.0 | 150.0 |
| 253418 | Olja | 2.174.492,30 | 2.475.000 | 2.846.250 | 2.846.250 | 2.846.3 | 2.846.3 |
| 253426 | Dekksútgerð | 145.106,87 | 100.000 | 120.000 | 120.000 | 120.0 | 120.0 |
| 253434 | Maskinútgerð | 164.333,38 | 150.000 | 200.000 | 200.000 | 200.0 | 200.0 |
| 253442 | Skipasmíðju-útreiðslur | 497.138,65 | 400.000 | 500.000 | 500.000 | 500.0 | 500.0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 90.782,74 | 100.000 | 150.000 | 150.000 | 150.0 | 150.0 |
| | | 6.162.190,27 | 7.419.876 | 8.285.588 | 8.255.588 | 8.255.6 | 8.255.6 |

## Figgjarætlan fyri Vaktar- og Bjargingartænastuna 1984/85

*Rakstrarstað 16334: »Ólavur Halgi«*

| Kontonummar og navn | | Roknskapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýris. 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 83904 | Inntøkur | 116.700,00 | | | | | |
| 103143 | Løn - starvsfólk | 3.149.894,10 | 3.301.880 | 3.485.408 | 3.485.408 | 3.405.4 | 3.485.4 |
| 103151 | Løn - avloysarar | 112.177,93 | 80.000 | 130.000 | 130.000 | 130.0 | 130.0 |
| 103405 | Løn - úrtíðarløn | 33.445,17 | 20.000 | 40.000 | 20.000 | 20.0 | 20.0 |
| 123103 | Skeið | 0,00 | 30.000 | 40.000 | 30.000 | 30.0 | 30.0 |
| 217702 | Ognar- og vanlukkutrygg. | 222.720,75 | 250.000 | 250.000 | 250.000 | 250.0 | 250.0 |
| 253107 | Kostur, búnyttur, vask | 225.618,10 | 285.000 | 350.000 | 350.000 | 350.0 | 350.0 |
| 253306 | Nav. amboð | 122.165,40 | 100.000 | 150.000 | 150.000 | 150.0 | 150.0 |
| 253418 | Olja | 1.556.492,03 | 2.025.000 | 2.458.750 | 2.458.750 | 2.458.8 | 2.458.8 |
| 253426 | Dekksútgerð | 79.454,91 | 100.000 | 120.000 | 120.000 | 120.0 | 120.0 |
| 253434 | Maskinútgerð | 121.381,96 | 150.000 | 200.000 | 200.000 | 200.0 | 200.0 |
| 253442 | Skipasmiðjuútr. | 863.568,78 | 400.000 | 500.000 | 500.000 | 500.0 | 500.0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 107.987,11 | 100.000 | 150.000 | 150.000 | 150.0 | 150.0 |
| | | 6.478.206,24 | 6.841.880 | 7.874.158 | 7.844.158 | 7.844.2 | 7.844.2 |

*Viðmerkingar til tær ymisku konti á figgjarætlanini hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni 1984/85.*

*Rakstrarstað 16301: Skrivstovan*

Lønarkonti 103048 og 103143 eru útroknaðar sambært skriv frá Landsstýrinum dagf. 11. aug. 1983.

Konto 103405 Úrtíðarløn er nýggj, og kemst hetta av væntandi meirarbeiði í samband við eftirlit við fiskiskapi eftir ungfiski v.m.

Aðrar konti eru hækkaðar ella lækkaðar sambært vantandi útreiðslum.

*Rakstrarstað 16315: »Tjaldrið«*

Lønarkonti 103143 og 103151 eru útroknaðar sambært skriv frá Landsstýrinum dagf. 11. aug. 1983.

Aðrar konti eru hækkaðar sambært væntandi útreiðslum.

*Rakstrarstað 16334: »Ólavur Halgi«*

Lønarkonti 103143 og 103151 eru útroknaðar sambært skriv frá Landsstýrinum dagf. 11. aug. 1983.

Konto 253107 er hækkað, og kemst hetta av, at Ólavur Halgi kemur at sigla við sjómannsskúlanæmingum ein part av árinum.

Konto 253418 er eisini munandi hækkað, og kemst hetta av, at siglingin hjá Ólavi Halga við sjómannsskúlanæmingum verður munandi økt, meðan hesir eru umborð.

Aðrar konti eru hækkaðar sambært væntandi útreiðslum.

**Útkast til rakstrarætlan fyri eitt vaktarskip uppá umleið 50 tons:**

| kontonr./navn | | Uppskot 1984/85 |
|---|---|---|
| 103143 | Løn - starvsfólk | 1.480.000,- |
| 103151 | Løn - avloysarar | 40.000,- |
| 103405 | Løn - úrtíðarløn | 10.000,- |
| 123103 | Skeið | 10.000,- |
| 217107 | Ognar- og vanlukkutrygging | 140.000,- |
| 253107 | Kostur, bátnýtslur, vask | 130.000,- |
| 253306 | Nav. amboð | 60.000,- |
| 253418 | Olja | 600.000,- |
| 253426 | Dekksútgerð | 60.000,- |
| 253434 | Maskinútgerð | 80.000,- |
| 253442 | Skipasmíðjuátr. | 200.000,- |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 80.000,- |
| | | 2.890.000,- |

Hetta er eitt nýtt skip, sum Vaktar og Bjargingartænastan hevur biðið um, men tolini eru ikki tikin við í fíggjarlógaruppskotið.

*Viðmerking landsstýrisins:*

Landsstýrið hevur avgjørt herettir at bóka útreiðslur til uttanlandsferðir hjá teimum smærru stovnunum á rakstrarstað 11758. Um stovnurin hevur brúk fyri uttanlandsferðum, verður sum vanligt sókt um farloyvi, og útreiðslurnar verða bókaðar á rakstrarstað 11758 sundurgreinað soleiðis, at møguleiki er fyri at síggja hvussu nógv, hvør stovnur til cina og hvørja tíð hevur nýtt til uttanlandsferðir.

---

Viðvíkjandi uppskoti til rakstraraetlan fyri eitt vaktarskip upp á umb. 50 tons.

Málið er ikki komið so langt áleiðis, at landsstýrið hevur játtað, at eitt tílíkt skip verður bygt. Peningur til endamálið verður tí ikki settur av á fíggjarlógaruppskotið enn.

**Ad § 16 - 16403 Laksa- og sílaaling**

*Sbrt. skriv dagf. 5. oktober 1983:*

**Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1984/84**

| í 1.000 kr. | Roknskapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýris. 1984/85 | Ætlan 1985/86 | Ætlan 1986/87 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Laksa- og sílaaling | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |



*Viðmerking:*

Útbyggingin av alistøðini við Áir er nú við at verða lokin. Vegna príshækkingar v.m. tørvar okkum omanfyri nevndu upphædd til liðuggerð av alistøðini.

| Kontonummar og navn<br>Rakstrarstað 16607 | Roknskapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýris. 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 103509 Samsýningar | 140 | 170 | 185 | 185 | 185 | 185 |
| 113202 Ferða- og dagpen. innanoyggja | 23 | 50 | 55 | 55 | 55 | 55 |
| 233354 Telefon og telex | 4 | 3 | 4 | 4 | 4 | 4 |
| | 167 | 223 | 244 | 244 | 244 | 244 |

**Ad § 16 - 16904/333017 Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna**

*Sbrt. skriv dagf. 5. oktober 1983:*

Sbrt. skriv háttvirda landsstýrisins dagf. 11. august 1983, seta vit upp niðanfyri útreiðslurnar 1982/83:

| | |
|---|---|
| Minstaløn | 9.288.717,00 |
| minstivinningur | 4.068.901,00 |
| prísískoyti til saltfisk | 3.081.366,00 |
| útróðrastudningur | 4.484.092,99 |
| landingarstudningur, mynstrað skip | 7.671.696,00 |
| flakastudningur | 1.025.405,00 |
| hemara- og sverkalvastudningur | 356.775,00 |
| idnaðarstudningur | 4.904.889,00 |
| agnstudningur | 9.169.359,02 |
| rakstrarstudningur | 54.436.854,42 |
| oljustudningur | 45.924.211,11 |
| frítíðarlon | 1.719.893,00 |
| flutningsstudningur | 450.046,70 |
| konto 16 2490/3301 punkt 18 | 6.310.881,00 |
| studningur til ráfiskagrunnin | 72.000.000,00 |
| fyrisæti | 1.824.757,22 |
| rentuútreiðslur | 681.006,60 |
| avskriving uppá innbúgv | 3.915,00 |
| | 227.402.766,06 |

Útgoldið frá 1. apríl til 31. august 1983:

| | |
|---|---|
| Minstaløn | 1.354.541,00 |
| minstivinningur | 868.253,00 |
| prísískoyti til saltfisk | 897.793,00 |
| eykastudningur 40 oyru | 1.014.509,00 |
| konto 16 2490/3301 punkt 18 | 482.523,00 |
| flakastudningur | 1.030.771,00 |
| útróðrastudningur | 2.053.702,11 |
| rakstrarstudningur | 18.187.668,12 |

| | |
|---|---|
| landingarstudningur, mynstraði skip | 4.244.658,00 |
| frítíðarløn | 1.355.776,00 |
| oljustudningur | 11.908.938,73 |
| fdnaðarstudningur | 2.067.279,00 |
| agnstudningur | 1.740.898,22 |
| flutningsstudningur | 81.981,35 |
| studningur til ráfiskagrunnin | 29.200.000,00 |
| fyrisæti | 715.038,92 |
| útgoldið í september — umleið | 20.500.000,00 |
| | 97.704.330,45 |

*Viðmerking landsstýrisins:*

Landsstýrið arbeiðir við broytingum í studningsskipanini til fiskivinnuna. Hetta arbeiðið er ikki liðugt, og verður ti sama upphædd, 205 mió. kr., sett av á liggjarlógaruppskotinum 1984/85 sum í 1983/84.

Undir konto 16904/333017 verða 5 mió. kr. av teimum 203 mió. kr. at seta í grunn: Serligur grunnur til fiskivinnuna, mest til at stuðla veiðu, sum ikki hevur verið munandi táttur í samfelagnum higartil, men kann gerast til tað.

**Ad § 17 - 17015 Landsdjóralæknin**

*Sbrt. skriv dagf. 22. sept. 1983:*

*Viðmerkingar:*

| | | |
|---|---|---|
| Ad. 103048: 1 landsdjóralækni | | |
| Ad. 103168: 1 hjálpardjóralækni, sáttmáli | kr. | 135.205,64 |
| eftirlønargjald | - | 18.520,56 |
| deildarleiðaraviðbót | - | 30.000,00 |
| reiðiviðbót | - | 50.525,46 |
| frítíðarmisjavni | - | 3.561,65 |

Lagt er upp fyri eini aldursviðbót pr. 1. juli 1984 og væntaðari hækking fram til 31. mars 1985 í sama mun sum higartil.

Ad. 253903: Aðrar útreiðslur: Lýsingar, skrivstovulutir, prent, tíðarrit, gjald fyri bakteriu- og virologiskar kanningar, sum ikki kunnu gerast á stovninum.

**Skjal 1 A**

| Kontonummar og navn | | Rokuskapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýris. 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103048 | Løn/tænastumenn | 258.516 | 264.4 | 267.3 | 267.3 | 2673 | 267,3 |
| 103168 | Løn/sáttmálalønt | 250.306 | 257.1 | 287.8 | 287.8 | 287.8 | 287.8 |
| 113202 | Ferða- og dagpeningur | 31.685 | 40.0 | 50.0 | 50.0 | 50.0 | 50.0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 3.000 | 3.0 | 3.0 | 3.0 | 3.0 | 3.0 |
| 233259 | Postgjald | 367 | 1.0 | 1.0 | 1.0 | 1.0 | 1.0 |
| 233354 | Telefon/telex | 3.671 | 5.5 | 7.0 | 7.0 | 7.0 | 7.0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 14.183 | 20.0 | 40.0 | 40.0 | 40.0 | 40.0 |
| 17015 | Landsdjóralæknaembætið | 561.728 | 591.0 | 656.1 | 656.1 | 656.1 | 656.1 |

6099

**Ad. § 17 - 17048 Landbúnaðarráðgevarin**

*Sbrt. skriv dagf. 12. oktober 1983:*

*Landbúnaðarráðgevarin: Figgjarlógaruppskot fyri figgjarárið 1984/85*

| Kontonummar og navn | | Roknskapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýris. 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103048 | Løn - tænastumenn | 185.834 | 195.000 | 205.000 | 205.000 | 205.0 | 205.0 |
| 103222 | Leiga av høli, reingerð v.m. | 12.000 | 14.000 | 12.000 | 12.000 | 12.0 | 12.0 |
| 113202 | Bilur og ferðaútr. innanlands | 30.751 | 35.000 | 45.000 | 45.000 | 45.0 | 45.0 |
| 233051 | Innbúgv | 3.285 | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.0 | 5.0 |
| 233155 | Prentlutir | 4.479 | 5.000 | 6.000 | 6.000 | 6.0 | 6.0 |
| 233259 | Postgjald | 498 | 1.500 | 1.500 | 1.500 | 1.5 | 1.5 |
| 233354 | Telefon/telex | 7.398 | 7.000 | 7.000 | 7.000 | 7.0 | 7.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovu-útreiðslur | 2.118 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 2.0 | 2.0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur skeiðvirksemi | — | 8.000 | 12.000 | 12.000 | 2.0 | 2.0 |
| 17048 | Landbúnaðar-ráðgevarin | 246.363 | 272.500 | 295.500 | 295.500 | 295.5 | 295.5 |

*Viðmerkingar:*

| | |
|---|---|
| 103048: | Lønarramma 20.-24.-29.-31. 31. lønarramma frá 1. jan. 1984. |
| 103222: | Reingerð, el, hiti og leiga av høli frá Føroya Jarðarráð. |
| 113202: | M.a. bilur keyptur 14/2-83. 3-ára keypisáttmáli. |
| 233051: | Reolir, skáp v.m. |
| 233155: | Bøkur, bløð, tíðarrit v.m. innan- og uttanlands. |
| 233259: | — |
| 233354: | — |
| 233561: | Vanligar skrivstovuútreiðslur |
| 253903: | Størstu útreiðslurnar á hesi konto kunnu verða skeiðvirksemi uttanlands, men er hetta torført at meta um. Okkurt árið verður lítið og einki brúkt, meðan onnur ár verður tað mesta brúkt. |

**Ad § 17 - 17053 Seyðaráðgevari og seyðaroyndir**

*Sbrt. skriv:*

| Kontonummar og navn | Roknskapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýris. 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 103509 Samsýningar | 60.000 | 66.000 | 72.000 | 68.500 | 68.5 | 68.5 |
| 113202 Ferða- og dagp. | 14.714 | 15.000 | 15.000 | 15.000 | 15.0 | 15.0 |
| 253903 Aðrar útreiðslur | | | | | | |
| Seyðamedisin Oyri og Fámjin | | | 1.175 | | | |
| Hegnpelar o.a. til Norðara Miðhaga í Fámjin | | | 6.827 | | | |
| Havsbrún fiskamjøl til Oyrar | | | 2.439 | | | |
| 2 el-klippimaskinur úr Danmark | | | 6.100 | | | |
| 2 brundseyðir til Oyrar | | | 2.300 | | | |
| Føroya Jarðarráð seyðahúslán Oyri | | | 11.594 | | | |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Porto-tlf. o.a. | 1.500 | | | | | |
| 2 elklippimaskinur úr Noreg | 5.438 | | | | | |
| Føroya Tøðfelag, kunsttøð Fámjin, Gøtu, Oyri | 7.628 | | | | | |
| Aðrar útreiðslur í alt | 45.000 | 54.000 | 54.000 | 54.000 | 54.0 | 54.0 |
| | 164.715 | 135.000 | 141.000 | 137.500 | 137.5 | 137.5 |

Um hetta uppskotið verður fylgt, meti eg, at tað kann røkka langt óbroytt eini 3 ár fram.

**Ad § 17 - 17103 Matrikulstovan**

Sbrt. skriv dagf. 4. oktober 1983:

Við hesum verður uppskot til fíggjarløgtingslóg 1984/85, samanborin við roknskapin 1982/83 og játtanina 1983/84, somuleiðis ætlan fyri 1985/86 og 1986/87, send Landsstýrinum.

| Konto | | Rokn-skapur 1982/83 1000 kr | Játtan 1983/84 1000 kr | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan 1985/86 1000 kr | Ætlan 1986/87 1000 kr |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103048 | løn tænastumenn | 953.5 | 966.0 | 1.130.0 | 1.130.0 | 1.130.0 | 1.130.0 |
| 103143 | — starvsfólk | 2.817.2 | 2.913.0 | 3.380.0 | 3.177.0 | 3.177.0 | 3.177.0 |
| 103222 | — reingerð | 79.1 | 120.0 | 130.0 | 130.0 | 130.0 | 130.0 |
| 103288 | — bønafólk | 195.6 | 120.0 | 200.0 | 123.0 | 123.0 | 123.0 |
| 113202 | ferð- og dagpen. | 156.8 | 160.0 | 160.0 | 160.0 | 160.0 | 160.0 |
| 213806 | leiguútreiðslur | 176.0 | 285.0 | 285.0 | 250.0 | 250.0 | 250.0 |
| 213105 | el- hiti og vask | 41.4 | 75.0 | 75.0 | 75.0 | 75.0 | 75.0 |
| 253306 | amboð-keyp-umsiting | 231.3 | 550.0 | 850.0 | 800.0 | 800.0 | 800.0 |
| 233051 | innbúgv | | 25.0 | 50.0 | 50.0 | 50.0 | 50.0 |
| 253928 | tænastuakfør | 169.8 | 70.0 | 170.0 | 170.0 | 170.0 | 170.0 |
| 253123 | tilfar-skrivst.-tekn. | 92.4) | | | | | |
| 253123 | — uppmáling | 130.0) | 550.0 | 550.0 | 500.0 | 500.0 | 500.0 |
| 253123 | — fotokop o.a. | 91.4) | | | | | |
| 253123 | kortkonst.- luftfoto | 532.0) | | | | | |
| 233259 | postgjald | 13.2 | 15.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 233354 | telefon, lýsingar | 44.3 | 85.0 | 85.0 | 85.0 | 85.0 | 85.0 |
| 253903 | aðrar útreiðslur | 49.2 | 60.0 | 460.0 | 60.0 | 60.0 | 60.0 |
| 83904 | ÷ inntøkur | 1.661.4 | 1.500.0 | 2.000.0 | 1.600.0 | 1.600.0 | 1.600.0 |
| | | **4.111.5** | **4.494.0** | **5.545.0** | **5.130.0** | **5.130.0** | **5.130.0** |

**Viðmerkingar til uppskotið:**

*Roknað verður við hesi manning:*

*Tænastumenn:*

| | | |
|---|---|---|
| stjóri | 36. lønarrammu | |
| 1 landmálari | 31. — | |
| 1 — | 29. — | |
| 2 hjálparlandmálarar | 20. — | (matrikulteknikarar) |
| 1 — | 17. — | (matrikulteknikari) |

*Sáttmálaløn fólk:*

3 landmálarar — løntir eftir sáttmála fyri sivilverkfrøðingar.
7 hjálparlandmálarar (matrikultekn.) — løntir eftir sáttmála við Teknikarafelagið.
2 næmingar — løntir eftir sama sáttmála
4 teknarar — løntir eftir sama sáttmála
1 næmingur — løntur eftir sama sáttmála
1 bókhaldari — løntur eftir sáttmála við Starvsmannafelagið
1 yvirassistentur — løntur eftir sama sáttmála
4 skrivstovufólk — lønt eftir sama sáttmála
2 fotoarbeiði o.a. — lønt eftir sama sáttmála

**Lønir:**

*Tænastumenn:*

| | | | |
|---|---|---|---|
| stjóri | | kr. | 241.149,- |
| landmálari | 1 | — | 220.549,- |
| — | 2 | — | 208.952,- |
| hjálparlandmálari | 1 | — | 157.128,- |
| — | 2 | — | 157.128,- |
| — | 3 | — | 144.569,- |
| | | kr. | 1.129.475,- |

*Starvsfólk:*

| | | | |
|---|---|---|---|
| landmálari | 3 | kr. | 240.130,- |
| — | 4 | — | 186.590, |
| — | 5 | — | 181.095,- |
| hjálparlandmálari | 4 | — | 150.627,- |
| — | 5 | — | 150.627,- |
| — | 6 | — | 150.627,- |
| — | 7 | — | 150.627,- |
| hjálparlandmálari | 8 | — | 136.005,- |
| — | 9 | — | 135.529,- |
| — | 10 | — | 134.103,- |
| næmingur | 1 | — | 52.833,- |
| — | 2 | — | 52.833,- |
| tekniskur teknari | 1 | — | 143.952,- |
| — — | 2 | — | 143.952,- |
| — — | 3 | — | 131.005,- |
| — — | 4 | — | 127.875,- |
| næmingur | 1 | — | 48.704,- |
| bókhaldari | 1 | — | 158.364,- |
| yvirassistentur | 1 | — | 155.214,- |
| skrivstovufólk | 1 | — | 140.364,- |
| — | 2 | — | 70.182,- |
| — | 3 | — | 127.014,- |
| — | 4 | — | 126.414,- |
| fotoarbeiði o.a. | 1 | — | 135.714,- |
| — | 2 | — | 150.000,- |
| | | kr. | 3.380.380,- |

tilsamans ..... kr. 4.509.855,00

Hvat lønum viðvíkur, verður víst til leiðbeining landsstýrisins, og er roknað við lønini 1. juli 1983, somuleiðis 4 prístalsviðbótum og teimum aldursviðbótum, ið gera seg galdandi í fíggjararinum 1984 '85.

*103048* Tænastumannastarvið sum hjálparlandmálari 3 er ongantið sett, men í uppskotinum er roknað við, at landsstýrið broytir normeringina soleiðis, at allir máliteknikararnir fáa umtrentliga somu løn. Hetta er normerað starv, men hóast tað hevur landsstýrið seinasta ár

strokið lønarupphæddina. Matrikulstovan mælir til, at ein tænastumaður verður settur afturat, soleiðis at tað verður 1 máliteknikari meira á stovninum.

*103143* Í uppskotinum er roknað við tí fólki, sum arbeiðir við stovnin í dag, at settur verður 1 fotografur og 3 næmingar afturat.

Viðvíkjandi næmingum verður vist á, at á teknistovuni arbeiða 4 fólk, harav 2 fyribils hava søkt um at arbeiða ½ dag, og at 1 hjálparlandmálari (tænastumaður) verður loystur úr starvi vegna aldur, frá umleið 1. mai 1984.

Somuleiðis verður søkt um at fáa serutbúgvið fólk til fotodcildina, og verður víst til viðmerking til konto 253306. Mælt verður til at setanin verður fyribils, galdandi í 2 ár.

Manningin á Matrikulstovuni er mestsum óbroytt frá 1975, men vísir tó heldur eina minking (sbr. viðlagt yvirlit). Tá landsstýrið tey seinastu árini ikki hevur verið sinnað at seta næmingar, verður støðan nú tann, at tað er ógjørligt at fáa útbúgvið fólk í Føroyum til stovnin við hóskandi kunnleika til hetta arbeiðið.

Allir teknikarar ið arbeiða á stovninum eru upplærdir her, og tá tað eru fólk, ið eru farin í annað arbeiði er tørvurin ikki nøktaður. Sjálvt um stovnurin fær játtað 2 teknikaranæmingar, ganga 2 ár áðrenn hesir eru førir fyri at arbeiða sjálvstøðugt, og tí ræður um at stovnurin fær loyvi at seta hesar næmingarnar sum skjótast aftaná 1. apríl 1984.

*103222* Við tað at Matrikulstovan hevur fingið størri høli, er roknað við at útreiðslan til reingerð verður 130 tús.

*103288* Her verður vist til roknskapin 1982/83. Nýttar vóru kr. 195.000,-, serliga til hjálparfólk við marknaseting og málihjálp.

Internationala samskipanin IAESTE, hevur seinastu árini biðið um, at Matrikulstovan tekur studentar, serliga verkfrøðingar við landmáling, sum sergrein til praktiska uppvenjing í 2 mánaðir um summarið.

Hetta er tann tíðin, ið Matrikulstovan serliga hevur brúk fyri fólki til útjarbeiði. Roknað er við 2 studentum komandi summar.

*113202* Víst verður til roknskapin 1982/83 og játtanina 1983/84.

*213806* Gólvviddin er 830 m², og er kostnaðurin kr. 340,- pr. m² um árið.

*213105* Í 1982/83 vóru nýttar 41 tús. Við øktum oljuprísi, el-prísi og størri hølum, er útreiðslan ætlað til 75 tús.

*253306* Her verða bókað landmálingsinstrument, skrivi- og roknimaskinur. Játtanin 1983/84 er 550 tús.

Í uppskotinum til fíggjarløgtingslóg 1983/84 varð upphæddin sett til 650 tús. vísandi til tá viðløgdu frágreiðing.

Í umbúna er at keypa kortleggingartól, soleiðis at stovnurin sjálvur gerst førur fyri at avgreiða stóran part av tí konstruktiónsarbeiði, ið higartil hevur verið gjørt uttanlands.

Eitt analytiskt úttekningartól við datastýrdum tekniborði (eftir tilráðing frá serkunnleika) vil eftir tilboði frá Zeiss tann 15. september 1983 kosta 1.6 mill. kr., umframt frakt og uppseting, t.v.s. uml. 1.8 mill. uttan toll.

Skipanin kann gerast soleiðis, at málingar eftir luftfoto kunnu førast beinleiðis á kort gjøgnum databanka og tekniborð. Eisini verða møguleikar fyri eini samskipan við matriklarnar, um hesir verða EDV-skrásettir.

Í umbúna er at gera avtalu við Geodætisk Institut um at verða ráðgevarar okkara. Instituttið hevur líknandi tól, og hevur Matrikulstovan gott samarbeiði við fólkið á teirri deildini.

Úttekningseindin verður uppsett og innkoyrd 1984 og teknieindin á vári 1985.

Hvat viðvíkur upplæring ella serútbúgving í hesum sambandi, verður talan um, at ein landmálari og ein teknikari fáa serútbúgving uttanlands.

Sum viðmerkt í seinasta uppskoti til fíggjarlóg setur nútíðar korttekniikkur stór krøv til fotodeildina, og tá nú eisini verður farið undir úttekning, ið setur serlig krøv, meta vit, at tað er umráðandi at loyvt verður at seta ein fotograf við serkunnleika á hesum økinum í 2 ár at leiðbeina og læra frá sær, soleiðis at besta góðskan fæst úr verandi myndatilfari.

*253928* Bilatalið er nú minkað til tríggjar, og verður ein bilur keyptur sambært langtíðarætlanina.

*253123* Vist verður til fíggjarætlan 1983/84 um luftfotografering summarið 1983. Hóast fleiri royndir í ár (veðurlagið var sum kunnugt serliga vánaligt) restar enn stórur partur av myndunum í 1 : 30.000 og 1 : 15.000, og er peningur tí settur til nýggja roynd summarið 1984.

*233259* Vist verður til roknskapin 1982/83.

*233354* Vøksturin stendst av leigu av vekslara og øktum telefongjøldum.

*253903* Á hesi konto verða bókaðar yvirútskiftingarútreiðslur v.m. og var játtanin seinasta ár 60 tús.

Matrikulstovan vísir til skrivligar frágreiðingar til landsstýrið um at geva út fyrilestrarøðina hjá E.A. Bjørk, fyrrverandi sorinskrivara, Færøsk bygderet I, II og III. Mett verður, at útgávan fíggjarliga kann greiða seg sjálv, soleiðis at útreiðslur og inntøkur javnviga við 400 tús.

*83904* Inntøkurnar eru mettar til 1.6 mill., av hesum umleið 650 tús. í gjøldum fyri matrikuleraðar broytingar, og annars kommunali parturin av matrikulering, eigaranna partur av útskifting og søla av kortum, myndum o.a.

Umframt er roknað við 400 tús. fyri sølu av bókum.

Starvsfólk á
Matrikulstovum
1951 - 1982



*Viðmerkingar landsstýrisins:*

Landsstýrið kann taka undir við, at ein landmálaranæmingur, 52.833,- kr., og ein tekniskur teknaranæmingur, 48.704,- kr., verða settir aftrat, meðan landsstýrið kann ikki taka undir við setanini av tí eina landmálaranæminginum, 52.833,- kr., og heldur ikki at ein foto-arbeiðari, 150.000 kr., verður settur á Matrikulstovuni.

| | | |
|---|---|---|
| Konto 103143 | starvsfólk | 3.380.380 kr. |
| | | ÷ 52.833 — |
| | | ÷ 150.000 — |
| | | 3.177.547 kr. |

Landsstýrið kann ikki taka undir við, at Matrikulstovan og Almanna-stovan leiga ta hæddina hjá Thomas Dam, sum P/f Data nú leigar.

*Ad konto 253306 Amboð - keyp - umsiting.*

Uppskot landsstýrisins er at seta 800.000 kr. av á hesi konto.

Av hesum 800.000 kr. verða 600.000 kr. settar í grunn til keyp av einum analytiskum tekningartóli, sum er mett at kosta 1,8 mió. kr. uttan toll.

Ad konto 253903 og 83904 viðvíkjandi bókini hjá E.A. Bjørk, Færøsk bygderet I, II, og III, so eru bæði inntøkur og útreiðslur tiknar av omanfyri nevndu kontoum, av tí at bókin verður fíggjað á annan hátt.

**Ad § 17 - 17205 Royndarstøð**

*Uppskot til fíggjarætlan 1984/85 viðvíkjandi Royndarstøðini.*

| | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan 1985/86 | Ætlan 1986/87 |
|---|---|---|---|
| 103143 Løn/starvsfólk | 250.000 | 250.000 | 250.000 |
| 103168 Løn/sáttmálaløn | 400.000 | 400.000 | 400.000 |
| 253284 Ísáðingarútreiðslur | 200.000 | 200.000 | 200.000 |
| 253928 Akfør | 20.000 | 20.000 | 20.000 |
| 253903 Aðrar útreiðslur | 20.000 | 20.000 | 20.000 |
| Í grunn til royndarstøð | 6.000.000 | 6.000.000 | 6.000.000 |
| | 6.890.000 | 6.890.000 | 6.890.000 |

*Viðmerking frá landsstýrinum:*

kr. 6.0 mió. verða at seta í grunn til nýggja royndarstøð.

**Ad § 17 - 17901/343054 - 343062 - 343021 - 343013 - 343038**
**Føroya Jarðarráð**

*Sbrt. skriv dagf. 20. oktober 1983:*

./. Viðlagt fíggjarætlan fyri 1984/85, ið umfatar:

mjólkarstudning
studning til súrhoysbrunnar
veltistudning
húsdýralógina
íløgur í Jarðargrunnin og
rentustudning

| Konto | Rokn-skapur 1982/83 kr. | Játtan 1983/84 1000 kr | Uppskot stovnsins 1984/85 1000 kr | Uppskot lands-stýrisins 1984/85 | Ætlan 1985/86 1000 kr | Ætlan 1986/87 1000 kr |
|---|---|---|---|---|---|---|
| mjólkarstudningur | 6.109.762,89 | 6.486 | 7.724 | 7.724 | 7.724 | 7.724 |
| súrhoysbrunnastudningur | 640.992,15 | 950 | 950 | 950 | 950 | 950 |
| nýdyrkan o.a. | 1.031.859,49 | 1.800 | 2.400 | 1.800 | 1.800 | 1.800 |
| Studn. til stráfóður (húsdýralógin) | 232.763,89 | 230 | 275 | 275 | 275 | 275 |
| íløgur í Jarðargrunnin | 3.500.000,00 | 3.800 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 |
| rentustudningur | 1.700.000,00 | 2.000 | 2.200 | 2.200 | 2.200 | 2.200 |
| | **13.215.378,42** | **15.266** | **17.549** | **17.749** | **17.749** | **17.749** |

*Viðmerkingar til mjólkarstudningin:*

Mjólkarmongdin, ið studningur varð latin til í 1982/83 var 3.639.054 l. til mjólkarvirkini og 20.866 l sum privatsøla.

Vøksturin í framleiðsluni var til mjólkarvirkini 4,5 %, og fyri alla selda mjólk 4 % frá árinum fyri.

Fyrra hálvár 1983/84 er vøksturin til mjólkarvirkini 2,1 %, og verður hesin vøkstur mettur at fara at verða 2,5 % fyri alt árið.

Fyri 1983/84 er vøksturin eisini mettur at fara at verða 2,5 %.

Av tí at útreiðslurnar støðugt eru vaksandi, metir ráðið tað vera rætt at taka undir við skrivi Føroya Búnaðarfelags (skjal nr. 1) um at hækka studningin til 1. floks mjólk við 30 oyru/l.

Somuleiðis metir ráðið tað eisini vera rætt at hækka flutningsstudningin við 10 oyrum, vísandi til skriv frá Lf. Mjólkarvirki Búnaðarmanna (skjal nr. 2).

Hjálagt er yvirlit yvir góðskuflokking av mjólk til mjólkarvirkini fyri teir fyrstu 9 mánaðirnar í 1983.

Neytakjøtsframleiðslan verður mett til 90.000 kg móti 87.920 kg í 1982/83.

*Viðmerkingar til studning til súrhoysbrunnar*

Hóast studningurin ikki varð nýttur allur í 1982/83, metir ráðið tað vera rætt at biðja um somu upphædd í 1984/85. Er hetta orsakað av, at regulering av studningsveitanini ikki er farin fram seinastu 4 árini, hóast byggiútreiðslurnar eru stórliga vaksnar. Eisini verður hugsað um, at tiltøk, ið beina fyri dálking av áum og vøtnum frá súrhoysbrunnum í størri mun enn higartil fara at verða sett í verk.

*Viðmerkingar til nýdyrkan*

Í 1983/84 vórðu veltir 316.577 m² upp úr týggjum, meðan 95.539 m² vórðu umvæltir.

Harafturat varð studningur latin til 1930 m av traktorvegum inni á nýdyrkaðum lendi.

Í teimum báðum bókaðu útreiðslunum eru kr. 402.870,00, ið eru fyri 1981/82, meðan kr 1.256.876,01 vórðu fluttar frá 1981/82.

Av nýggjum útreiðslum av hesi konto eru uml. kr. 800.000,00 studningur til stráfóður.

Við árslok 1983/84 verður mett, at allur tøkur peningur á hesi konto er brúktur, og út frá ætlanunum um, at veltir verða 300.000 m², 100.000 m² verða umvæltir, kr. 150.000,00 latið í studningi til køstar og kr. 50.000,00 til amboð o.a. saman við fyrr nevnda stráfóðurstudningi, verður samlaða upphæddin mett til kr. 2.400.000,00

*Viðmerkingar til íløgur í Jarðargrunnin*

Skal íløgutørvurin fyri ein part gangast á møti, er neyðugt við framhaldandi játtan, og verður tí biðið um kr. 4.000.000,00.

*Viðmerkingar til rentustudningin*

Rentustudningstørvurin í dag er uml. kr. 2.100.000,00. M.a. vegna støðugt hækkandi DM-virði verða rentuútreiðslurnar av uttanlandsláni grunsins at hækka støðugt, og verður tí biðið um kr. 2.200.000,00. Lánið, ið varð upptikið í 1981, gongur yvir 10 ár, og er avdráttarfrítt fyrstu 6 árini.

*Sbrt. skriv dagf. 18. oktober 1983 frá Føroya Búnaðarfelag:*

Føroya Búnaðarfelag vil hervið heita á Føroya Jarðarráð um at fáa hækkað mjólkarstudningin fyri fíggjarárið 1984/85 frá 0,90 kr. til 1,20 kr. pr. ltr.. Hetta svarar til o.u. 1,1 millión kr. vøkstur, tá ið vit rokna við einari nøgd uppá 3,8 mill. ltr. mjólk.

Vit halda hetta vera neyðugt við tað, at mjólkarprísurin ikki fæst at fylgja við dýrtíðar- og lønarvøkstrinum.

Hjálagt skjal viðvíkjandi mjólkarprísi (lutfalstøl).

Lagtingstíðindi 1983B – 79

**Uppseting av serprístali fyri mjólkarframleiðslu við 4 roknskapum sum grundarlag**

| | % lutfall frá 1979 sett at galda | Um prísbroytingarnar | at falda við frá 1975 - 1980 | hækkað lutfall | pr.1.10. 1983 |
|---|---|---|---|---|---|
| 1. Rakstraravlop | 36,1 | Fylgir arbeiðsmannatímaløn<br>1975: 21,31 kr.<br>1980: 41,60 kr.<br>okt. 1983: 59,79 kr. | 1,95<br>2,57 | 70,395 | 92,777 |
| 2. Kraftfóður | 33,9 | A-blanding<br>í meðal 1975: 100 kr.<br>heystið 1980: 125<br>okt. 1983: 155 | 1,25<br>1,55 | 42,375 | 52,545 |
| 3. Handilstøð (sýra) | 5,3 | NPK í 1975: 71 kr.<br>(1) í 1981: 112 kr.<br>í 1983: 138 kr. | 1,58<br>1,94 | 8,374 | 10,232 |
| 4. Fastognarútreiðslur | 5,9 | fylgir »býli« í 1/10-83: 103,7 húsarhaldsprístalinum | 2,52 | 9,735 | 14,868 |
| 5. Maskinur, amboð og nýtslulutir | 12,4 | sum DEUTZ-traktorur:<br>1975/90.000 kr.<br>1978/100.000 kr.<br>1983/220.000 kr. | 1,50<br>2,89 | 18,6 | 35,836 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 6. Orka | 3,8 | fylgir »orku« í húsarhaldsprístalinum 162 | 2,20<br>3,80 | 8,36 | 14,44 |
| 7. Ymiskt (farmagjald, medisin, ísáðing o.a.) | 2,6 | meðal av hinum 97,4 % | 1,62<br>2,266 | 4,212 | 5,89 |
| | **100** | prísur til framl. 1/10-83<br>frá virkinum ..... 3,80<br>studningur ..... 0,90<br>stráfóðurstudn. .... 0,10<br>**ískalt ..... 4,80 kr/lit** | | **162,051** | **222,34** |

(1) Her er seinasta hækking tikin við.
At falda mjólkarprísin frá 1975 við: $\frac{162,051}{100} = 1,62$
Mjólkarprísur til framleiðara var í 1975: 2,45 kr./kg
Eftir hesum átti hann nú at verið: 2,45 kr. × 1,62 = 3,97 kr./kg  2,45 × 2,26 = 5,55
÷ at leggja uppímóti rokniskaparskylduni: 0,25 -  0,25 × 1,459 × 1,097 = 0,38

*Sbrt. skriv dagf. 18. oktober 1983 frá*
*L/f Mjólkarvirki Búnaðarmanna:*

*Viðvikjandi flutningsstudninginum til Mjólkarvirkið*

Nú eru meira enn 2 ár liðin síðan flutningsstudningurin er vorðin reguleraður.

Sum kunnugt, so bleiv nýggjur tangabilur keyptur til primært at røkja Norðoyggjar og Sandoynna, og hevur hetta økt munandi um flutningskostnaðin hjá virkinum.

Afturat hesi eyka uppgávu, sum virkið hevur átikið sær, kemur so tann vanliga prístals- og lønarhækkingin, sum hevur verið hesi árini.

Vit fara at heita á avvarðandi m[illegible]kar um at hava hesi viðurskifti í huga undir fíggjarlógarvið[illegible].

**Góðskuflokking í %**

| | Mjólkarvirki Búnaðarm. | Thorshavns Mælkeforsyning & Margarinefabr. | Suðuroyar margarinv. | samanlagt |
|---|---|---|---|---|
| 1. flokkur | 92,9 % | 36,8 % | 68,8 % | 89,6 % |
| 2. flokkur | 4,4 % | 23,5 % | 11,8 % | 5,5 % |
| 3. flokkur | 2,0 % | 18,2 % | 11,0 % | 3,0 % |
| 4. flokkur | 0,7 % | 21,5 % | 8,4 % | 1,9 % |
| **Innvigað mjólkarmongd** | | | | |
| **1982/83** | **3.285.093 kg** | **169.803 kg** | **184.158 kg** | **3.639.054 kg** |

(Viðm.: góðskuflokkingin fyri Mjólkarv. Búnaðarm. er roknað út frá 9 mán., jan. - sept. 1983
— — T. M. & M. — — — 8 — jan. - aug. 1983
— — Suðuroyar Marg. — — — 7 — jan. - juli 1983)

---

*Viðmerkingar frá landsstýrinum:*

Nýdyrkan o.a. umfatar bæði nýdyrkan og studning til stráfóður.
Uppskot landsstýrisins er, at henda verður býtt sundur í tvey soleiðis:

| | |
|---|---|
| Nýdyrkan | 1.800.000 kr. |
| Studningur til stráfóður | 800.000 kr. |

**Ad § 17 - 17901/343079 Træplanting**

*Sbrt. skriv dagf. 25. oktober 1983:*

Hjálagt letur nevndin Landsstýrinum umbidna uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri 1984/85 fyri Skógfriðingarnevndina - træplanting.

Viðløgd skjøl: frá 1 - 5, ialt 10 bløð.

*Viðvíkjandi kt. 723000 - 723867 Skógfriðingarnevndin*

Rakstrarstaður 61017 Føroya Gjaldstovu
Rakstrarstaður 11276 Føroya Landsstýris

Við hesum letur nevndin Føroya Landsstýri uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri 1984/85.

Biðið verður um landskassastudning upp á ialt kr. 1.114.300.

*Viðløgd skjøl:*
1. Fíggjarætlanaruppskot, 2 bløð
2. Viðmerkingar til uppskot, 3 bløð
3. Serligir formularar, skjal I og II
4. Yvirlit yvir plantingarstøð, 1 blað
5. Ognaruppgerð, aktiv og passiv konti

FÍGGJARÆTLANARUPPSKOT 1984/1985

| 723000 | Inntøkukonti, felags | Uppskot fyri 84/85 | |
|---|---|---|---|
| 723013 | Landskassastudningur | kr. | 1.114.300,- |
| 723021 | Søla av plantum | | 150.000,- |
| 723038 | Arboretið, trø t. viðal. | | 212.000,- |
| | Inntøkur tilsamans: | kr. | 1.476.300,- |
| 723062 | Útreiðslukonti, felags | | |
| 723079 | Keyp av plantum | kr. | 90.000,- |
| 723067 | Lønir | | 336.000,- |
| 723095 | Rakstur, bilar v.m. | | 40.000,- |
| 723109 | Keyp av amboðum | | 100.000,- |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 723117 | Ferðaútreiðslur | | 25.000,- |
| 723125 | Telefon, skrivstovuhald, lýsingar | | 30.000,- |
| 723133 | Aðrar útreiðslur | | 5.000,- |
| 723141 | Arboretið | | 70.000,- |
| 723158 | Umboðan | | 10.000,- |
| 723166 | Tøð, hegn v.m. | | 50.000,- |
| 723174 | Skógfriðingarnevndin | | 30.000,- |
| 723204 | Útreiðslukonti, viðalundir í Tórshavn | | |
| 723212 | Keyp av plantum | kr. | 120.000,- |
| 723229 | Lønir | | 275.000,- |
| 723237 | Umvælingar | | 5.000,- |
| 723245 | Ferðaútreiðslur | | 0,- |
| 723253 | Aðrar útreiðslur | | 2.000,- |
| 723308 | Útreiðslukonti, viðarlundir í Norðoya Sýslu | | |
| 723316 | Keyp av plantum | kr. | 10.000,- |
| 723324 | Lønir | | 20.000,- |
| 723332 | Umvælingar | | 5.000,- |
| 723349 | Ferðaútreiðslur | | 5.000,- |
| 723357 | Aðrar útreiðslur | | 500,- |
| 723403 | Útreiðslukonti, viðarlundir í Eysturoyar Sýslu | | |
| 723411 | Keyp av plantum | kr. | 5.000,- |
| 723428 | Lønir | | 40.000,- |
| 723436 | Umvælingar | | 10.000,- |
| 723444 | Ferðaútreiðslur | | 4.000,- |
| 723452 | Aðrar útreiðslur | | 5.000,- |
| 723507 | Útreiðslukonti, viðarlundir í Streymoyar Sýslu | | |
| 723515 | Keyp av plantum | kr. | 2.000,- |
| 723523 | Lønir | | 15.000,- |
| 723531 | Umvælingar | | 10.000,- |
| 723548 | Ferðaútreiðslur | | 500,- |
| 723556 | Aðrar útreiðslur | | 200,- |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 723602 | Útreiðslukonti, viðarlundir í Vága Sýslu | | |
| 723619 | Keyp av plantum | kr. | 15.000,- |
| 723627 | Lønir | | 10.000,- |
| 723635 | Umvælingar | | 0,- |
| 723643 | Ferðaútreiðslur | | 5.000,- |
| 723651 | Aðrar útreiðslur | | 100,- |
| | Útreiðslukonti, viðarlundir í Suðuroyar Sýslu | | |
| 723818 | Keyp av plantum | kr. | 60.000,- |
| 723826 | Lønir | | 40.000,- |
| 723834 | Umvælingar | | 5.000.- |
| 723842 | Ferðaútreiðslur | | 10.000,- |
| 723859 | Aðrar útreiðslur | | 1.000,- |
| 723867 | Rakstur av husinum | | 10.000.- |
| | Útreiðslur tilsamans | kr. | 1.476.300,- |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1984/1985 | Útreiðslukonti 723062 - 723867 | kr. | 1.476.300,- |
| | Inntøkukonti 723021 - 723038 | | 362.000,- |
| Umbiðin landskassastudningur 1984/1985 | | kr. | 1.114.300,- |

*Viðmerkingar til uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri skógfriðingarnevndina 1984/85*

*723000 - Inntøkukonti, felags*

*723013 - Landskassastudningur :* Munurin millum útreiðslu- og inntøkukonti.

*723021 - Søla av plantum:* Søla av plantum til privat (burtur av tí, sum verður keypt av plantum uttanlands og av plantum úr Arboretinum).

*723038 - Arboretið:* Plantur, sum eru aldar fram í Arboretinum, og sum verða s tar út í viðarlundirnar. Upphæddirnar eru eftir uppgerð skógfútans um, hvussu mangar plantur eru niðursettar á hvørjum stað.
Arboretið verður krediterað og viðarlundirnar debiteraðar.

Planturnar hava ymist virði (frá 8 til 150 krónur). Her verður nýtt eitt lágt tal eftir bestu meting.

*723062 - Útreiðslukonti, felags:*

*723079 - Keyp av plantum:* Samsvarar kostnaðinum av plantum, sum verða keyptar uttanlendis (til sølu til privat, til niðursetting í plantuskúla og niðurseting í viðarlundum beinan vegin)

*723087 - Lønir:* Lønir til skógfútan og tímalønt fólk faklært/ófaklært til alingararbeiði á alistøðini í Hoydølum.

*723095 - Rakstur, bilar v.m.:* Bensin/olja, umvælingar av bilum, traktorum, gravimaskinum, fresarum o.t. Umvælingar av arbeiðshúsum og skúrum v.m. Tekniskar umvælingar.

*723109 - Keyp av amboðum:* Ætlanin er at keypa nýggjan, 4-hjólsdrignan jeep. Tann uppsetta upphæddin verður vist í minna lagi.

*723117 - Ferðaútreiðslur:* Viðvíkjandi tænastuferðum skógfútans, innan- og uttanlendis og annara, sum starvast við ella hava serstakligt tilknýti til stovnin (umboðan á ársfundum Nordisk Arboretudvalgs).

*723125 - Telefon, skrivstovuhald, lýsingar:* Stovnurin nýtir privattelefon skógfútans, og fær hann endurgjald samsvarandi. Skrivstovuhaldið umfatar tann vanliga raksturin og verður umsitið av tímaløntum fólki eftir tørvi. Lýsingar viðvíkja plantusølu o.t.

*723133 - Aðrar útreiðslur:*

*723141 - Arboretið:* Verður tikið á norrønum grundarlag í vísindaligum samstarvi við hini Norðurlondini. Her snýr tað seg um nýroyndir við fremmandum plantutilfari, og er neyðugt við serkønari ráðgevarahjálp. Okkara partur av hesum samstarvi er at lata ferðapening og gjald fyri innivist umframt smærri samsýningar til teir útlendsku serkønu, sum eftir áheitan frá nevndini koma higar á hvørjum ári. Herundir innsavning uttanlands.

*723158 - Umboðan:* Viðvíkur vanligum blíðskapi ímóti teimum fremmandu, sum koma higar. Annaðhvørt serkønum ella øðrum vitjandi úr ymsum londum, sum hava serligan áhuga og kunning tilplantingarroyndir í Føroyum, ella sum hava gjørt okkum munagóðar tænastur (við t.d. ókeypis sendingum av plantingartilfari).

*723166 - Tøð og hegn o.t.:* Fyri skjótari gróður av niðursettum og meira framkomnum plantum gerst neyðugt við nógv meira taðing enn higartil. Ætlandi verður eisini tørvur á munandi meira inngirðing við hegni í komandi fíggjarári. Uppframi allar plantingar í Føroyum.

*723174 - Skógfriðingarnevndin:* Herundir útreiðslur til fundir í nevndini, fundarpeningur, ferðapeningur, møguliga gjald fyri vistarhald og/ella vikar.

*Viðmerkingar til uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri skógfriðingarnevndina 1984/85*

| | |
|---|---|
| 723204 - 723867 | Útreiðslukonti ymsu viðalundanna, skipaðar eftir sýslum.<br>Samanber viðlagt yvirlit yvir viðarlundir. |

*Keyp av plantum:* Skuldskriving (sýsluvís + Tórshavn) fyri latið plantutilfar til niðurseting úr alistøðini (arboretinum).
Alistøðini/Arboretinum verður góðskrivað samsvarandi.

*Lønir:* Lønarútreiðslur eftir bestu meting til tær ymisku viðalundirnar/plantingarnar. Viðroknað verður bæði lokal arbeiðsmegi og tann, sum verður send út frá alistøðini úr Hoydølum.
Arbeiðini umfata alt, sum hevur við viðarlundirnar og teirra forsvarliga rakstur at gera: inngirðing, grevstur av veitum, úttynning, nýplanting o.s.fr.

*Umvælingar:* Mettar upphæddir til umvæling av inngirðing, portrum, gongugøtum o.s.fr.

*Ferðaútreiðslur:* Flutningur av arbeiðsfólki, bilum og góðsi millum alistøðina og arbeiðsplássini (ferðaseðlar etc.).

*Aðrar útreiðslur:* Ymsar aðrar útreiðslur, sum ikki koma inn á onnur konti.

| Konto | Roknskapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot 1984/85 | Fyri 1985/86 | Fyri 1986/87 |
|---|---|---|---|---|---|
| 723000 - 723867<br>Rakstrarstað nummar 61017<br>Skógfriðingarnevndin | 729.037,32 | 700.000 | 1.114.300 | 1.253.588 | 1.410.287 |

*Fyri fíggjarárini 1985/1986 og 1986/1987 kann Skógfriðingarnevndin, eftir bestu meting, ikki koma til annað úrslit sum løgtingsfíggjarlógaruppskot enn eina hækking uppá minst 12 - 13 % hvørt árið, og tá er tikið fyrivarni fyri víðkan av arbeiðsøkinum.*

**Yvirlit yvir plantingar undir Skógfriðing (arbeiðsplass)**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| *Norðoya sýsla* | Mikladalur | 2,0 ha | | |
| | Kunoy | 1,5 | | |
| | Klaksvík | 2,5 | tils.: | 6,0 ha |
| *Eysturoyar sýsla* | Leirvík | 0,5 ha | | |
| | Sølmundarfjørður | 1,0 | | |
| | Selatrað | 1,5 | tils.: | 3,0 ha |
| *Streymoyar sýsla* | Hvalvík | 1,0 ha | | |
| | Kirkjubø | 2,0 | tils.: | 3,0 ha |
| *Tórshavn* | Havnardalur | 50.0 ha | | |
| | Marknagil | 3,0 | | |
| | Í Grið (v/Landav.) | 1.0 | | |
| | Í Kerjum (v/Grótbrotið) | 2,5 | | |
| | Debesar Trød (er Müllar bøur) v.m. | 2,0 | | |
| | Gundadalur | 9,0 | | |
| | Í Sortudíki | 0,5 | | |
| | Ovaru Hoydalar | | | |
| | Miðhoydalar | 5,0 | | |
| | Niðaru Hoydalar | 3,5 | tils.: | 76,5 ha |
| *Vága sýsla* | Miðvágur, Ellisheimið | | | |
| | -- , í Tungu | 1,0 | tils.: | 1,0 ha |
| *Suðuroyar sýsla* | *Tvøroyri/Tr.vágur* | | | |
| | Sevmýri | 0,5 ha | | |
| | Kirkjan | 0,5 | | |
| | Sjúkrahúsið | 1,0 | | |
| | Mangibakki og Perssons trød | 5,0 | | |
| | Vágur | 4,0 | tils.: | 11,0 ha |
| | **Tilsamans** | | | **100,5 ha** |

## AKTIV OG PASSIV KONTI

*723905 Aktiv konti:*

*723913 Bilar v.m.*

| | | |
|---|---|---|
| Fresari + tilhoyr | 60.000,- | |
| Gamal jeepur | 4.000,- | |
| Vøruvognur | 7.500,- | |
| Rennugravari | 30.000,- | |
| 2 gamlar motorsagir | 1.000,- | |
| 1 kjarrsag | 1.000,- | |
| 1 avbarkari | 1.500,- | |
| Hondamboð, sjakar, øksir v.m. | 5.000,- | 110.00,- |

*723921 Hús, økir og annað*

| | | |
|---|---|---|
| Hús + viðal. á Sevmýri | 100.000,- | |
| Viðalund á Selatrað | 250.000,- | |
| Viðalundspartur í Trongisvági | 20.000,- | |
| Viðalund í Kirkjubø | 50.000,- | |
| Fototól, Diastól t. plantumyndasavnið | 3.000,- | 423.000,- |

*723954 Passiv konti:* 0,-

Økið og húsini (Alistøðin/Arboretið) í Hoydølum er leigað frá Tórshavnar kommunu fyri 100 ár. Árliga leigan: 3.000,00 kr.

---

*Viðmerkingar Landsstýrisins:*

*Ad § 17 - 343079 Træplanting:*

Uppskot landsstýrisins er at játta 800.000 kr.

**Ad § 18 - 18109 Arbeiðseftirlitið**
*Sbrt. skriv dagf. 9. nov. 1983:*

| Kontonummar og navn | | Roknskapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 83904 | Ymiskar inntøkur | | ÷ 25.000 | ÷ 34.000 | 30.000 | 30.0 | 30.0 |
| 103343 | Løn starvsfólk | | 640.000 | 685.900 | 685.900 | 685.9 | 685.9 |
| 103366 | Løn sáttmálalønt | | 258.000 | 268.000 | 263.000 | 263.0 | 263.0 |
| 103222 | Løn reingering | | 0 | 28.000 | 28.000 | 28.0 | 28.0 |
| 103405 | Yvirtíðarløn | | 25.000 | 48.000 | 45.000 | 45.0 | 45.0 |
| 103509 | Samsýningar | | 76.000 | 84.600 | 84.600 | 84.6 | 84.6 |
| 113202 | Ferða- og dagpeningur (innanlands) | | 67.000 | 73.700 | 73.700 | 73.7 | 73.7 |
| 223103 | Skeið og onnur upplýsing | | 25.000 | 107.000 | 107.000 | 107.0 | 107.0 |
| 203308 | Lýsingar | | 7.000 | 12.000 | 12.000 | 12.0 | 12.0 |
| 203507 | Umboðan | | 0 | 12.000 | 0 | 0 | 0 |
| 213105 | El- og vask | | 0 | 14.000 | 14.000 | 14.0 | 14.0 |
| 213808 | Leiguútreiðslur | | 80.000 | 113.000 | 113.000 | 113.0 | 113.0 |
| 233053 | Innbúgv | | 84.000 | 259.500 | 59.500 | 59.5 | 59.5 |
| 233155 | Prentlutir | | 20.000 | 50.000 | 50.000 | 50.0 | 50.0 |
| 233259 | Postgjald | | 2.000 | 3.000 | 3.000 | 3.0 | 3.0 |
| 233254 | Telefon-Telex | | 20.000 | 30.000 | 30.000 | 30.0 | 30.0 |
| 233504 | Sakkøn hjálp | | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 10.0 | 10.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | | 20.000 | 35.000 | 35.000 | 35.0 | 35.0 |
| | | | 1.309.000 | 1.795.700 | 1.583.700 | 1.583.7 | 1.583.7 |

*ad. konto 83904:*
Ymiskar inntøkur koma at hækka við árunum orsakað av fleiri lógarbundnum sýns- og kanningararbeiði + vanligum prísvøkstri.

*ad. konto 103143:*

| | | |
|---|---|---|
| Bruttoløn | skrivstovufólk | kr. 156.400,- |
| do | eftirlitsmaður | kr. 176.700,- |
| do | do | kr. 166.500,- |
| do | nýggjur do | kr. 166.300,- |
| do | frítíðar-avloysari | kr. 20.000,- |
| Bruttoløn starvsfólk íalt | | kr. 685.900,- |

*ad. konto 103168:*

| | |
|---|---|
| Bruttoløn leiðara | kr. 258.000,- |
| Dýrtíðarhækking | kr. 5.000,- |
| Bruttoløn sáttmálaløgt íalt | kr. 263.000,- |

*ad. konto 103222:*
Aftaná at stovnurin er fluttur í nýggj høli, koma vit sjálvir at umsita reingeringina.

| | |
|---|---|
| Nýggj konto | kr. 28.000,- |

*ad. konto 103405:*
Sambært sáttmála hava eftirlitsmenn rætt til yvirtíðarløn

| | |
|---|---|
| | kr. 45.000,- |

*ad. konto 103509:*
Landskassans partur av løn

| | | |
|---|---|---|
| til justermeistara | kr. 81.600,- | |
| Dýrtíðarhækking | kr. 3.000,- | kr. 84.600,- |

*ad. konto 113202:*
Ferða- og dagpeningur innanlands.
Vegna økta vitjan á virkjum verða hesar útreiðslur
større — ætlað: ..... kr. 73.700,-

*ad. konto 123103:*
Skeiðvirksemi og onnur upplýsandi tiltøk:
**a.** Av tí at nógvar vanlukkur henda av trukkum og at orsøkin til vanlukkurnar ofta visir seg at vera ókunnleiki til handfaring og passing av hesum vandamiklu maskinum, er ætlanin at seta í verk skeið fyri allar trukkførarar, soleiðis at hesir skulu hava eitt trukkføraraprógv, áðrenn teir fáa loyvi til at koyra trukk.
Talan er um uml. 300 trukkførarar, sum skulu hava eitt 80 tíma skeið hvør.
Viðmerkjast skal, at henda sama skipan er galdandi fyri øll okkara grannalond.
Ætlaðar útreiðslur pr. ár yvir 3 ár ..... kr. 81.000,-
Landskassans partur ⅔ ..... kr. 54.000,-

**b.** Skeið fyri tryggleikafólk, sum Arbeiðseftirlitið hevur skyldu at geva frálæru í trygd á arbeiðsplássum ... kr. 22.000,-

**c.** Skeið fyri málarar v.fl. sum nýta epoxymáling..... kr. 15.000,-

**d. Framsýning**
Arbeiðseftirlitið luttók við framsýning av persónligari trygdarvernd á HS-stevnuni í Ítróttarhøllini í ár við positivum úrsliti. Ætlanin er at halda fram við hesum upplýsandi tiltaki.
Ætlaðar útreiðslur ..... kr. 16.000,-

*Samlaðar útreiðslur a, b, c og d* ..... *kr. 107.000,-*

*ad konto 203308:*
Vegna større virksemi innan upplýsing v.m. verða hesar útreiðslur større ..... kr. 12.000,-

*ad. konto 203507:*
*Umboðan.* Nýggj konto sum er ein fylgja av avtalaðum samstarvi við okkara grannalond, serliga Danmark.
Ætlaðar útreiðslur ..... kr. 12.000,-

*ad. konto 213105:*
Aftaná at stovnurin er fluttur í nýggj høli, skulu vit sjálvir umsita el- og vask.
Ætlaðar útreiðslur ..... kr. 14.000,-

*ad. konto 213806: Leiguútreiðslur*
Árlig leiga ..... kr. 108.000,-
Dýrtíðarhækking ..... kr. 5.000,-
Árlig leiga alt ..... kr. 113.000,-

*ad konto 233051: Innbúgv*
a. Tað er ógvuliga stórur tørvur á at geva teimum trygdarfólkum, sum verða vald úti á virkjum, eina ávisa frálæru í trygd á arbeiðsplássum — eitt sokallað trygdarskeið. Ætlanin er, at vit sjálvir skulu halda hesi skeið í okkara nýggju hølum. Til hetta endamál krevst ymisk AV-útgerð, so sum TV, filmar, video, talvur v.m.
Ætlaðar útreiðslur hertil ..... kr. 25.000,-

b. Í okkara skrásetingararbeiði av virkjum varð hædd tikin fyri at fáa allar upplýsingar frá virkjum, so sum slag av arbeiði, tal av arbeiðsfólki, slag av tekniskari útgerð, vanlukkutilburðir v.m. skrásettar á ein slíkan hátt, at hesir lætt kunnu data-viðgerast.
Viðmerkjast skal eisini, at øll Teknisk Deild sum so hevur stóran tørv á EDV-útgerð, tá hugsað verður um skipa- og virkismetingar, tollmál v.m.
Ætlaðar útreiðslur til installatiónir og tól..... kr. 200.000,-

Løgtingstíðindi 1988 – 91

**c.** Stovninum tørvar telex-útgerð,
innleggingargjald ..... kr. 9.500,-

**d.** *Mátingartól.* Arbeiðseftirlitinum tørvar tól til arbeiðshygieiniskar mátingar.
Ætlaðar útreiðslur ..... kr. 25.000,-
*Samlaðar útreiðslur fyri a, b, c og d* ..... *kr. 259.500,-*

*ad konto 233155: Prentlutir*
Útreiðslurnar hertil eru munandi øktar vegna fleiri føroyskar reglugerðir, forskriftir og skeiðtilfar.
Ætlaðar útreiðslur ..... kr. 50.000,-

*ad konto 233259:*
Postgjald økt til ..... kr. 3.000,-

*ad konto 2333354:*
Telefon - telex økt til ..... kr. 30.000,-

*ad konto 233504:*
Sakkøn hjálp — óbroytt ..... kr. 10.000,-

*ad konto 233561:*
Aðrar skrivstovuútreiðslur
Økt til ..... kr. 35.000,-

**Ad § 18 - 18152 Brandvenjingarstøð við Áir**
*Sbrt. skriv:*

| Kontonummar og navn | Rokn-skapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Kontonummar 253903 | | | | | | |
| Rakstrarstað 18152 | | | | | | |
| Brandvenjingarstøðin við Áir | 416.000 | 251.920 | 387.376 | 194.000 | 139.0 | 145.0 |

**Sundurgreining og uppskot fram til 1986/87:**

| | 1984/85 | 1985/86 | 1986/87 |
|---|---|---|---|
| Løn til støðleiðaran | 162.120 | 167.160 | 173.460 |
| Løn tímalønt fólk | 85.104 | 90.210 | 94.720 |
| Tiltøk móti olju-dálking | 122.152 | 0 | 0 |
| Hiti [illegible] el | 18.000 | 20.250 | 22.680 |
| Ialt | 387.376 | 277.620 | 290.860 |

Nevndin fyri Brandvenjingarstøðina vil hervið heita á fíggjarnevndina um at taka *helvtina* av nevndu upphæddum við á fíggjarlógina, og vilja vit so søkja tryggingarnar um at fíggja hina helvtina.

*Viðmerkingar landsstýrisins*
Uppskot landsstýrisins er at játta í:

| 1984/85 | 1985/86 | 1986/87 |
|---|---|---|
| 194.000 | 139.000 | 145.000 |

**Ad § 18 - 18202 Bileftirlitið**
*Sbrt. skriv:*

| Kontonummar og navn | | Rokn-skapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 83964 | Ymiskar inntøkur | ÷1.975.3 | ÷2.100.0 | ÷2.200.0 | ÷2.200.0 | ÷2.200.0 | ÷2.200.0 |
| 103143 | Løn - starvsfólk | 645.3 | 750.0 | 820.0 | 820.0 | 820.0 | 820.0 |
| 103222 | Løn - ringerð | 98.9 | 100.0 | 120.0 | 120.0 | 120.0 | 120.0 |
| 103288 | Løn - onnur | 476.7 | 560.0 | 625.0 | 625.0 | 625.0 | 625.0 |
| 103405 | Løn - úrtíðarløn | 53.6 | 50.0 | 50.0 | 50.0 | 50.0 | 50.0 |
| 113202 | Ferða- og dagpeningur innanlands | 86.4 | 160.0 | 160.0 | 150.0 | 150.0 | 150.0 |
| 113243 | Ferða- og dagpeningur uttanlands | 0.0 | 40.0 | 40.0 | 0 | 0 | 0 |
| 123128 | Eftirútbúgving | 1.4 | 40.0 | 40.0 | 40.0 | 40.0 | 40.0 |
| 203308 | Lýsingar | 0.0 | 1.0 | 1.0 | 1.0 | 1.0 | 1.0 |
| 203403 | Dagbløð, tíðarrit v.m. | 2.4 | 4.0 | 2.0 | 2.0 | 2.0 | 2.0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 58.8 | 50.0 | 70.0 | 70.0 | 70.0 | 70.0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 290.8 | 300.0 | 320.0 | 320.0 | 320.0 | 320.0 |
| 233051 | Innbúgv | 8.7 | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 233155 | Prentlutir | 24.7 | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 233259 | Postgjald | 9.2 | 10.0 | 12.0 | 12.0 | 12.0 | 12.0 |
| 233354 | Telefon og Telex | 52.0 | 55.0 | 65.0 | 65.0 | 65.0 | 65.0 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 233553 | EDV-útreiðslur | 18.2 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútr. | 22.5 | 30.0 | 30.0 | 30.0 | 30.0 | 30.0 |
| 253306 | Amboð | 42.3 | 150.0 | 150.0 | 150.0 | 150.0 | 150.0 |
| 253881 | Hálkubreyt, í grunn | 0.0 | 500.0 | 1.000.0 | 500.0 | 500.0 | 500.0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 51.3 | 60.0 | 60.0 | 60.0 | 60.0 | 60.0 |
| 253928 | Tænastuakfør, rakstur v.m. | 67.3 | 60.0 | 60.0 | 60.0 | 60.0 | 60.0 |
| 353075 | Bileftirlitið í grunn | 1.000.0 | 1.000.0 | 2.000.0 | 1.000.0 | 1.000.0 | 1.000.0 |
| | | 1.015.0 | 1.960.0 | 3.575.0 | 2.015.0 | 2.015.0 | 2.015.0 |

Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1984/85 fyri rakstrarstað 18202 *Bileftirlitið*
Skjal 11 verður sent.

*Viðmerkingar landsstýrisins:*
*Konto 113202* Ferða- og dagpeningur innanlands, játtaðar verða 120.000 kr. í 1983/84.

*Konto 113202* Ferða- og dagpeningur uttanlands.

Landsstýrið hevur avgjørt, at framyvir verða útreiðslur til uttanlandsferðir hjá teimum smærru stovnunum bókaðar á rakstrarstað 11758. Um stovnurin hevur brúk fyri uttanlandsferðum, verður sum vanligt søkt um farloyvi, og útreiðslurnar verða bókaðar á rakstrarstað 11758 og ikki á stovnin. Tó verður rakstrarstað 11758 sundurgreinað soleiðis, at møguleiki er fyri at síggja, hvussu nógv hvør stovnurin til eina og hvørja tíð hevur brúkt til uttanlandsferðir.

*Konto 353073:* Bileftirlitið í grunn. Hetta er byggigrunnur bileftirlitsins. Játtaðar verða 1.000.000 kr. í 1984/85.

*Konto 253881:* Hálkubreyt í grunn. Játtaðar verða 600.000 kr. í 1984/85.

**Ad § 18 - 18216 Radioeftirlit**
*Sbrt. skriv dagf. 30. sept. 1983:*

Vísandi til bræv landsstýrisins, dagsett 11/8-83, skulu vit mæla til, at settar verða kr. 460.000,- (herav kr. 120.000,- til tænastubil), á fíggjarløgtingslógina 1984/85 viðvíkjandi rakstrarstaði 18216/353209: *radioeftirlitið.*

Arbeiðið verður røkt av einum manni við tænastubili sum brátt verður 6 ára gamal. Vegna tess, at bilurin rustar illa, og at hann seinasta árið hevur havt fleiri brek (vegna slit og elli), og sostatt javnan er til umvælingar, meta vit, at skilabest hevði verið at útvega nýggjan tænastubil.

Harumframt er neyðugt at hava mátitól, amboð og tilfar.

Nú Sjónvarp Føroya fer at virka, er væntandi, at nógv meira verður at gera á hesum øki eisini, og at neyðugt verður við tólum til hetta arbeiðið, samstundis sum útbúgving er neyðug. Ætlanin varð, at radioeftitlitið í farna fíggjarári 1982/83 skuldi útvegað sær ymisk mátingartól sum eru neyðug, men av ymiskum orsøkum eydnaðist hetta ikki tá.

Hetta bar í sær, at uppskotið til fíggjarløgtingslóg 1982/83 varð nakað misvísandi. Tá stovnurin eisini verður biðin um eina ætlan fyri 1985/86 og 1986/87, verður hetta hervið gjørt við fyrivarni.

| Kontonummar og navn | Roku-skapur | Játtan | Uppskot stovnsins | Uppskot landsstýrisins | Ætlan | Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | 1985/86 | 1986/87 |
| | 1982/83 | 1983/84 | 1984/85 | 1984/85 | í 1.000 kr. | í 1.000 kr. |
| Radioeftirlitið: 18216/35309 | 226.000 | 275.000 | 460.000* | 400.0 | 400.0 | 400.0 |

*) Av hesum eru kr. 120.000,- ætlaðar til nýggjan tænastubil.

*Viðmerkingar landsstýrisins:*
Uppskot landsstýrisins er at játta 400.000 kr. á konto 18216/353209 Radioeftirlit.

Frágreiðing frá radioeftirlitinum 1982 til skjals á Landsskrivstovuni.

**Ad. § 18 - 18235 Ráðið fyri ferðslutrygd**
*Sbrt. skriv dagf. 17. okt. 1983:*

Ráðið fyri Ferðslutrygd loyvir sær hervið at heita á Føroya Landsstýri, um at tað í figgjarárinum 1984/85 verða játtaðar ráðnum *kr. 340.500,-* til arbeiði tess og rakstur av skrivstovuni.

Ráðið hevur eisini sent Tryggingarsambandið Føroyar umsókn um somu upphædd.

Samlaðu útreiðslurnar eru mettar til kr. 711.000,-.

Tær seinastu kr. 30.000,- metir ráðið at kunna fáa inn við limagjaldi frá kommunum og øðrum.

Vist verður annars á viðløgdu skjøl.

**Figgjarætlan fyri 1984/85**

| | |
|---|---|
| Tilskot frá Landinum | kr. 340.500,- |
| Tilskot frá Tryggingarsambandinum | kr. 340.000,- |
| Tilskot frá kommunum | kr. 30.000,- |
| | kr. 711.000,- |

*Útreiðslur*

| | | |
|---|---|---|
| a. | Lønir | kr. 250.000,- |
| b. | Bókføring og grannskoðan | kr. 7.000,- |
| c. | Lýsingar, porto og telefon | kr. 25.000,- |
| d. | Leiga, hiti, ljós og reingerð | kr. 45.000,- |
| e. | Aðrar útreiðslur | kr. 10.000,- |
| f. | Tiltøk í komandi figgjarári | kr. 240.000,- |
| g. | Samsýning til limir í undirnevndum | kr. 25.000,- |
| h. | Ferðaútreiðslur og fundir | kr. 50.000,- |
| i. | Keyp av tilfari | kr. 50.000,- |
| j. | Limagjald til PRI | kr. 9.000,- |
| | | kr. 711.000,- |

*Viðmerkingar til útreiðslusíðuna*

a. Lønir til leiðara og skrivstovufólk ½ dag.
b. Útreiðslur til grannskoðan samb. roknskap.
c. Útreiðslur til lýsingar, porto og telefon samb. rokuskap; Ráðið metir tað hava týdning við upplýsandi og agiterandi lýsingum í bløðunum.
d. Útreiðslur til leigu, ljós, hita og reingerð samb. roknskap; Hesar útreiðslur eru øktar munandi, orsakað av at vit eru flutt í betri hóskandi høli.
e. Ætlaðar aðrar útreiðslur.
f. Tiltøk í komandi fíggjarári samb. hjálagda yvirlit.
g. Samsýning til limir í teimum serligu undirnevndum, sum eru settar av starvsnevndini.
h. Ætlaðar ferðaútreiðslur og útreiðslur í samband við almennar fundir og framsýningar um ferðslutrygd.
i. Ætlaðar útreiðslur til keyp av undirvísingartilfari, ið ókeypis verður latið skúlum og barnagørðum.
j. Útreiðslur í samband við at vit eru limir í *»La Prevention Routiere Internationale« — PRI.*

**Yvirlit yvir tiltøk í fíggjarárinum 1984/85**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Alkoholaksturkampanja | kr. 45.000,- |
| 2. | Aldrandi í ferðsluni | kr. 25.000,- |
| 3. | Søgan um ferðsluakfør | kr. 20.000,- |
| 4. | Søgan um ferðsluskeltini | kr. 15.000,- |
| 5. | Endurskinskampanja | kr. 25.000,- |
| 6. | Tilfar til barnagarðar | kr. 15.000,- |
| 7. | Tilfar til skúlar | kr. 20.000,- |
| 8. | Ferðsluringur Barnanna | kr. 50.000,- |
| 9. | Lyktakanning | kr. 15.000,- |
| 10. | Árliga frágreiðingin frá RÍF | kr. 10.000,- |
| | | kr. 240.000,- |

*Viðmerkingar til omanfyristandandi:*

ad. 1. Kampanja at veita upplýsing um alkohol og ferðslu.
ad. 2. Nýprentan av hefti til bæði eldri og yngri, um eldri í ferðsluni.

ad. 3. Nýprentan av myndabók ætlað børnum.
ad. 4. Nýprentan av myndabók ætlað smærri børnum.
ad. 5. Kampanja at eggja øllum at nýta endurskin og ljós í ferðsluni.
ad. 6. Samprenting við Trygg Trafikk í Noregi um tilfar til barnagarðar.
ad. 7. Samprenting við Trygg Trafikk í Noregi um tilfar til skúlar.
ad. 8. Framhald av arbeiði sum er í gerð, skal í 1984 setast í verk og fara at virka.
ad. 9. Lyktakanning eins og undanfarin ár.
ad. 10. Árliga frágreiðingin frá RFF um ferðslustøðuna í Føroyum.

— — — —

Roknskapurin til skjals á Landsskrivstovuni.

*Viðmerking frá landsstýrinum:*
Játtaðar verða 275.000 kr.

**Ad. § 18 - 18268 Filmseftirlit**
*Sbrt. skriv:*
*Skjal 1.*

| Kontonummar og navn | | Rokn-skapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 103288 | Løn - onnur | 13.500 | 22.500 | 24.750* | 24.750 | 24.75 | 24.75 |
| 103509 | Samsýningar | 126.137 | 129.500 | 142.450* | 142.450 | 142.45 | 142.45 |
| | | | | 167.200 | 167.200 | 167.20 | 167.20 |

*) *Viðmerking:*
Higartil, meðan lógargrundarlagið undir virki Filmseftirlitsins hevur verið stoðugt, hevur Filmseftirlitið kunnað skotið upp játtan, sum hevur vist seg at hildið sera væl. Í løtuni ber hetta illa til, tí nýggj »censurlóg« verður helst løgd fyri tingið í hesi tingsetu.

Væntandi verður eftirlitið at umfata eisini video, so helst verður virki filmseftirlitsins nógv økt og sum heild verður nógv broytt.

Dugi í løtuni ikki at meta øðrvísi enn at skjóta upp fyribils somu upphædd sum undanfarnu ár, hækkað við 10%.

**Ad. § 18 - 18318 Semingsmannaskipanin**
*Sbrt. skriv dagf. 26. sept. 1983:*

| Konto | | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýris. 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| 103509 | Samsýningar | 31.000 | 31.000 | 32.000 | 33.000 |
| 253903 | Aðrar útr. | 10.000 | 10.000 | 40.000 | 15.000 |
| | | 41.000 | 41.000 | 72.000 | 48.000 |

Metingin er gjørd út frá tí, at í 1983 vórðu flestu sáttmálar gjørdir fyri tvey ár. Tað skuldi tí ikki verið so nógv brúk fyri semingsstovninum aftur fyrr enn í 1985.

**Ad. § 18 - 18337 Læruráðið**
*Sbrt. skriv dagf. 14. oktober 1983:*

Føroya Læruráð sendir hervið landsstýrinum uppskot til fíggjarlóg fyri 1984/85. Stórvegis broytingar eru ikki gjørdar í mun til seinasta uppskot. Vónandi kann Føroya Landsstýri og fíggjarnevndin ganga hesum uppskoti á møti.

| Kontonummar og navn | | Rokn-skapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 83904 | Ymiskar inntøkur | ÷ 10.450 | ÷ 30.000 | ÷ 30.000 | ÷ 30.000 | ÷ 30.0 | ÷ 30.0 |
| 103288 | Løn - onnur | 2.618 | 23.000 | 25.300 | 25.000 | 25.0 | 25.0 |
| 103509 | Samsýningar | 144.054 | 280.000 | 308.000 | 308.000 | 308.0 | 308.0 |
| 113202 | Ferða- og dagpeningur (innanlands) | 240 | 8.000 | 8.800 | 8.800 | 9.0 | 9.0 |
| 113243 | Ferða- og dagpeningur (uttanlands) | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 23308 | Lýsingar | 3.640 | 5.000 | 5.500 | 5.500 | 6.0 | 6.0 |
| 233155 | Prentlutir | 490 | 12.000 | [illegible] | 13.000 | 13.0 | 13.0 |
| 233561 | Aðrar útreiðslur | 7.685 | 8.000 | [illegible] | 8.800 | 9.0 | 9.0 |
| | | | 306.000 | [illegible].600 | 339.600 | 340.0 | 340.0 |

*Viðmerkingar:*
*ad 83904 Ymiskar inntøkur.*
Inntøkur koma av tilmeldingargjaldinum til sveinaroynd. Læruráðið hevur samtykt at hækka tilmeldingargjaldið fyri hvønn lærling úr kr. 50,00 upp í kr. 200,00.

*ad. 103509.* Útreiðslurnar av hesari konto fara mest til skoðanarmeistarar, eftirlitsfólk v.m.

*ad. 113243.* Læruráðnum nýtist ongan pening til uttanlandsferðir.

*Alment:*
Skrivstovuarbeiðið í Læruráðnum er sera nógv vaksið seinastu 2 árini. Fyri 1980 var læruráðið mett at brúka umleið ¼ av arbeiðstíðini hjá einari skrivstovukvinnu í landsstýrinum. Nú krevur læruráðið mest sum alla tíðina hjá einari skrivstovukvinnu á Landsskúlafyrisitingini.

**Ad § 18 - 18907/353018 Ferðamannastovan**
*Sbrt. skriv dagf. 30. sept. 1983;*

Víst verður til skriv Landsstýrisins 11. august um innsendan av uppskoti til fíggjarløgtingslóg 1984/85 viðvíkjandi rakstrarstaði 18907/353018.

Fyribils verður roknskapur felagsins álmanakkaárið 1982 viðlagdur, sum vísir eitt rakstrarhall upp á kr. 133.917,45, sum saman við hallinum árið fyri kr. 90.891,77, gevur eina negativa kapitalkonto uppá kr. 224.809,22.

Orsakað av, at ikki allir nevndarlimir felagsins vóru til steðar hesa vikuna, eydnaðist ikki at fáa fullmannaða nevnd at koma við endaligum uppskoti, og loyva vit okkum tí at biðja um útseting til endan av komandi viku.

Komandi uppskot er eisini ávirkað av tí álitinum til loysn av føroysku ferðamannaviðurskiftunum, sum kanningarnevndin handaði landsstýrinum í gjár, tí virki ferðamannastovunnar og heildarloysnin av føroysku ferðamannaviðurskiftunum eru so nær tengd at hvørjum øðrum.

Roknskapurin er til skjals á Landsskrivstovuni.

*Sbrt. skriv dagf. 6. oktober 1983:*

Í framhaldi av skrivi okkara 30. september, tá vit innsendu roknskapin fyri árið 1982, skulu vit nú siga frá, at á nevndarfundi felagsins 3. í h. varð avgjørt at søkja um

*kr. 600.000,-*

í studningi til rakstur av Ferðamannastovuni komandi løgtingsfíggjarár 1. apríl 1984 til 31. mars 1985.

— — — — — —

*Viðmerkingar landsstýrisins:*
Uppskot landsstýrisins er at játta 500.000 kr. á rakstrarstað 18907/353018 Føroya Ferðamannafelag í 1984/85.

**Ad § 18 - 18907/353042 Til Menningargrunnin**

Roknskapur og annað tilfar viðvíkjandi peningatørvi Menningargrunsins er til skjals á Landsskrivstovuni.

**Ad § 19 Fólkapensjón v.m.**
*Sbrt. skriv dagf. 1. nov. 1983:*

Vísandi til skriv landsstýrisins frá 11. august 1983, j. nr. 400-36, senda vit hjálagt skjal 1 við meting okkara um útreiðslur landsassans til almanna-veitingar í fíggjarárinum 1984/85, 1985/86 og 1986/87.

Sostatt eru landskassans útreiðslur til almannamál fyri 1984/85 mettar til 182.158.000 kr. og fyri 1985/86 og 1986/87 til tað sama, meðan játtaðar eru 162.183.000 kr. fyri 1983/84 og eftir fyribils roknskapi nýttar 140.307.000 kr. í 1982/83.

Játtanin til frítíðarheimið í Skrivaragøtu, 737.000 kr. fyri 1984/85, er nú eins og áður tald undir útreiðslunum til Vanliga forsorg og er henda konto nú nevnd Onnur hjálp eftir forsorgarlógini. Kontoirnar, sum fyrr vóru til Vanliga forsorg, Víðkaða hjálp og Einkjuhjálp eru nú eisini taldar við á kontoini Onnur hjálp eftir forsorgarlógini. Kontoin til Einkjupensión er nú býtt sundur í Einkjupensión og Uppiskoytisveiting.

Metingarnar eru gjørdar sambært skrivligu leiðbeiningini, sum vit hava fingið, og skulu vit tó leggja fylgjandi aftrat:

Útgjaldingarnar av almanna-veitingum fevna um fólkapensión, avlamispensión, heimahjálp, dagpening og ymisk sløg av hjálp annars.

Tølini av móttakarum vóru pr. 1. januar 1983 hesi:

Fólkapensión 4.422, avlamispensión v.m. 1.184, einkjupensión 92, einkjubarnapening 343, barnaforsorg 70, hjálp eftir forsorgarlógini 352, dagpeningur 165, heimahjálp 820 (heim).

Roknað er við, at talið á fólka- og avlamispensiónistum økist við umleið 2% árliga.

Útreiðslan til dagpening er mett eftir útreiðsluni v.m. fyri tíðina 1. apríl til 30. september 1983, og hava vit ikki roknað við hækking í talinum av móttakarum.

Sum álagt undir pkt. 5 í leiðbeiningini er roknað við eini øking upp á 10% av teimum tølum, sum vit annars hava roknað út og mett grundað á viðurskiftini (útgjaldingum) pr. 1. juli 1983. Tá talan er um fólka- og avlamispensión v.m., er hendan hækking tó gjørd í mun til útreiðslurnar pr. 1. oktober 1983, av tí at hesar eru grundaðar á danska juli-prístalið.

| Kontonummar og navn | | Rokn-skapur 1982/83 | Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19056 | Fólkapensión | 67.900 | 79.245 | 91.440 | 91.440 | 91.440 | 91.440 |
| 19106 | Avlamispensión | 25.118 | 28.010 | 31.170 | 31.170 | 31.170 | 31.170 |
| 19208 | Barnastyrkur til stakar uppihaldarar | 1.349 | 1.280 | 1.845 | 1.845 | 1.845 | 1.845 |
| 19301 | Einkjupensión | 1.168 | 1.285 | 1.075 | 1.075 | 1.075 | 1.075 |
| | Uppískoytisveiting | 1.113 | 1.245 | 1.015 | 1.015 | 1.015 | 1.015 |
| 19403 | Onnur hjálp eftir forsorgarlógini | 7.709 | 12.455 | 12.183 | 12.183 | 121.183 | 12.183 |
| 19557 | Barnaforsorg | 3.683 | 3.915 | 4.385 | 4.385 | 4.385 | 4.385 |
| 19607 | Heimahjálp | 14.144 | 15.153 | 16.250 | 16.250 | 16.250 | 16.250 |
| 19659 | Dagpeningaskipanin | 10.558 | 11.695 | 13.995 | 13.995 | 13.995 | 13.995 |
| 19664 | Bjálving av húsum hjá pensiónistum | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| 19752 | Brennistudningur til pensiónistar | 3.671 | 3.700 | 3.700 | 3.700 | 3.700 | 3.700 |
| 19904 | 363611 Ellisheim | 894 | 1.200 | 2.100 | 2.100 | 2.100 | 2.100 |
| | | 140.307 | 162.183 | 182.158 | 182.158 | 182.158 | 182.158 |

**Ad § 19 - 19904/363636 Fráhaldsfeløg**
*Skrl. skriv dagf. 10. okt. 1983 frá Felagsnevndini hjá Blákross í Føroyum:*

Vísandi á undirskotið á fíggjarætlan okkara fyri árið 1983/84 loyvir felagsnevndin fyri Blákross í Føroyum sær, eins og undanfarnu ár, at søkja um studning til arbeiði okkara frá Føroya Landsstýri, við vón um at fáa so mikið sum gjørligt av hesi peningsupphædd.

| Játtan 1983/84 | Uppskot stovnsins 1984/85 | Uppskot landsstýrisins 1984/85 | Ætlan 1985/86 í 1.000 kr. | Ætlan 1986/87 í 1.000 kr. |
|---|---|---|---|---|
| 350.000 | 350.000 | 350.000 | 350.0 | 350.0 |

*Viðvíkjandi studningi til fráhaldsfeløg.*
Í samband við uppskot til fíggjarløgtingslóg 1984/85, loyvir felagsnevndin sær, eftir áheitan landsstýrisins, at føra fram niðanfyristandandi:

Felagsnevndin takkar fyri studningin sum latin er, hann kemur væl við, tí stórur tørvur er á eini hjálpandi hond í tí arbeiði, sum fráhaldsfeløgini avrika.

Feløgini útvega sjálvi stórar peninganøgdir við limagjaldi, basarum, cydnuhjóli, bingo, sjónleikum og á annan hátt til virksemið og tey tiltøk, sum framd verða landið runt, bæði fyri yngri og eldri.

Seinast sendu vit umsókn um kr. 180.000 í studningi, m.a. til at løna einum instruktøri/skrivara, men hóast játtanin til fráhaldsfeløgini á fíggjarlógini var kr. 300.000, so fingu vit bert kr. 80.000, sjálvt um vit umboða øll fráhaldsfeløgini uttan eitt. Vónandi kunnu vit hesafturð rokna við størri stuðli til arbeiði okkara.

Í londunum uttanum okkum er drykkjuskapur millum ungdóm og børn vorðin eitt stórt problem, har er ikki óvanligt at børn niður í 11-12 ár eru rúsdrekkaávirkað, sjálvt um øll londini hava lóggávu, sum bannar útvegan av rúsandi drykkjum til ung undir 18 ella 20 ár. Heima hjá okkum er drykkjuskapur millum ung eisini økjandi, sjálvt um støðan ikki er so ring, sum í okkara grannalondum, men tað er neyðugt at eitt arbeiði verður gjørt, fyri at halda ungdóminum burtur

frá drykkjuskapi, við m.a. at útvega ungdóminum eitt alkoholfrítt alternativ í hansara stuttleikalívi, og geva honum umstøður at koma saman í, hvar tað ber til at hugna sær undir tryggum umstøðum.

Á hesum øki gera fráhaldsfeløgini eitt stórt arbeiði, og tað kann sigast at, rættulig gongd er í ungdómsarbeiðinum, sum feløgini skipa fyri. Eisini verður stórur dentur lagdur á at virka millum børnini og geva teimum sunnar fritíðarinteressur, samstundis sum upplýsing verður givin um vandan við alkoholnýtslu. Fráhaldsfeløgini halda, at hetta er vegurin at ganga, til at byrgja fyri ungdómsdrykkjuskapi.

Fráhaldsfeløgini hava øll egin hús, men hølini, sum nýtt verða til arbeiði millum ungdóm og børn, eiga at vera tíðarhóskandi, og til hetta krevst nógvur peningur.

Tey, ið stíla fyri felagsarbeiðinum, [illegible] tað øll av áhuga fyri arbeiðinum, og øll hjálp er sjálvboðin, sum [illegible]aki verður goldið fyri.

Fyri at kunna gera arbeiðið effektivt og fruktargott er neyðugt at tey, ið skapa fyri, hava kunnleika til tílíkt arbeiði, og til tess at útbugva tey, og tey ungu sum sjálvi taka sær av arbeiðinum, hava verið hildin skeið her í Føroyum, til útbúgving av leiðarum og instruktørum. Hesi skeið eru avrikað í samarbeiði við fráhaldsfeløgini í okkara grannalondum, sum hava latið instruktørar og lærarar til hetta. Eisini hava ungdómar verið sendir til tílík skeið í hinum norðurlondum og eisini aðra staðni.

Umframt at good-templaraordanin er limur í alheims good-templara felagsskapinum, so umboðar felagsnevndin Føroyar í internationala ráðnum móti alkohol- og narkotikabrúki. ICAA er ein felagsskapur, sum er viðurkendur av Felag Sameindu Tjóða, og hevur høvuðssæti í Lausanne í Schweiz. Eftir førimuni royna vit at vera við í hesum arbeiði, fyri tann vegin at fáa kunnleika til tær kanningar viðvíkjandi alkoholnýtslu, sum hesin stovnur skipar fyri, og sum kunnu vera til stóra hjálp í okkara arbeiði.

Tíverri kunnu vit ikki fult út nýta fyrimunirnar av limaskapi í tí norrøna og tí internationala felagsskapinum, tí hetta krevur pening. Umframt limagjaldið eru tað eisini ferðaútreiðslurnar, sum telja nógv. Higartil hava limir luttikið í hesum norrøna og internationala arbeiði fyri egnu rokning, men hesum kunnu vit ikki rokna við í framtíðini. Hetta er tí eisini ein umsókn um studning til tær útreiðslur, sum hetta arbeiði ber í sær.

Okkara vón er tí, at almenni studningurin til okkara arbeiði kann verða hækkaður so mikið, at vit kunnu halda fram og útbyggja okkara arbeiði soleiðis, at tað kemur øllum samfelagsborgarum okkara til

góðar. Lønina fær samfelagið aftur fleirfaldað við øktum aktiviteti á arbeiðsmarknaðinum.

Samstundis sum vit takka fyri tann studning, sum higartil er latin til fráhaldsarbeiðið, loyva vit okkum at koma við umsókn um hækkaðan studning á komandi fíggjarlóg.

Uppskot okkara er tí, at játtað verður Felagsnevnd Føroysku fráhaldsfelaga niðanfyri nevndi studningur:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Vanligur studningur til arbeiðið hjá fráhaldsfeløgunum | kr. | 75.000 |
| 2. | Studningur til at løna einum instruktøri/skrivara | kr. | 115.000 |
| 3. | Studningur til luttøku í norrønum og internationalum arbeiði | kr. | 30.000 |
| 4. | Studningur til skeiðvirksemi við fremmandum instruktørum og luttøku í skeiðum uttanlands | kr. | 40.000 |
| | Tilsamans | kr. | 260.000 |

**Ad § 19 - 19904/363644 Felagið Reyði Krossur**
*Sbrt. skriv dagf. 28. sept. 1983:*


The Faroese delegation, recalling the traditional Faroese share in the fishery of North Sea herring, declared its intent to seek consultations with the EEC with a view to establish a quota for the Faroe Islands if herring fishery in ICES IV be resumed in 1984.

Agreement in the form of an exchange of letters between the European Economic Community, on the one hand, and the Government of Denmark and the home Government of the Faroe Islands, on the other hand, establishing measures for salmon fishing in North Atlantic waters.

*A. Letter from the Home Government of the Faroe Islands.*

Sir,

The Faroese authorities have noted that the European Economic Community has expressed concern regarding Faroese fishery of salmon.

I have the honour to confirm that the Faroese authorities have undertaken to introduce the following restrictions on Faroese Salmon fishery pending the adoption of regulatory measures in the framework of the North-Atlantic Salmon Convention for the fishing season referred to below:

1. The Faroese authorities will restrict the total volume of salmon catches in Faroese waters (area of fisheries jurisdiction of Faroe Islands) to a total of 625 metric tonnes in fresh round weight for the season starting on 1. october 1984 and ending on 31st May 1985.

2. No fishing for salmon will take place outside the fishing season referred to under paragraph 1.

I would be grateful if you would confirm that the European Economic Community is in agreement with the foregoing.

Please accept, Sir, the assurance of my highest consideration.

*For the Home Goverment*
*of the Faroe Islands*

*B. Letter from the European Economic Community.*

Sir,

I have the honour to acknowledge receipt of your letter of today's data, which reads as follows.

»The Faroese authorities have notet that the European Economic Community has expressed concern regarding Faroese fishery of salmon.

I have the honour to confirm that the Faroese authorities have undertaken to introduce the following restrictions on Faroese Salmon fishery pending the adoption of regulatory measures in the framework of the North-Atlantic Salmon Convention for the fishing season referred to below:

Lagtidende 1984 – 53

1. The Faroese authorities will restrict the total volume of salmon catches in Faroese waters (area of fisheries jurisdiction of Faroe Islands) to a total of 625 metric tonnes in fresh round weight for the season starting on 1st october 1984 and ending on 31st of May 1985.

2. No fishing for salmon will take place outside the fishing seasons referred to under paragraph 1.

I would be grateful if you would confirm that the European Economic Community is in agreement with the foregoing.«

I have the honour to inform you that the Community has taken note of the contents of your letter.

Please accept, Sir, the assurance of my highest consideration.

*On behalf of the Council*
*of the European Community*

**Skjal 9 B**

**J.nr. 1500-1-11-2**

## UMSETING
## Váttað frásøgn um samráðingarnar um fiskiskap millum EEC og Føroyar í Bruxeelles 13. december 1983.

I. Ein sendinevnd, umboðandi felagsskapin við harra L.E. Andreasen sum formanni og ein sendinevnd, umboðandi Føroya Landsstýri við harra Paula Ellefsen sum formanni, hittust í Bruxelles 12. og 13. december 1983 til samráðingar um sínámillum fiskiskap í 1984.

II. Sendinevndirnar samdust um at viðmæla myndugleikum teirra, at tær kvotur fyri 1984, ið eru upprknaðar í hjálagda skjali, skulu galda fyri skip hjá einum av pørtunum, sum fiska í sjógvi hjá hinum partinum.

III. *Fiskireglur*

1. Føroyska sendinevndin greiddi felagsskapssendinevndini frá teimum teknisku reglum, ið skuldu galda fyri fiskiskap í føroyskum sjógvi í 1984.
2. Sambært § 4, petti 2, í rammusáttmálanum millum Føroyar og EEC greiddu EEC-myndugleikarnir føroysku sendinevndini frá nýggjum tiltøkum, sum EEC møguliga fór at seta í verk í 1984.
3. Sendinevndirnar samdust um, at um annar parturin ætlar at innføra ella broyta fiskireglur, ið koma at galda fyri fiskifør hjá hinum partinum, skal hann boða hinum partinum frá slíkum ætlanum við minst 14 daga ávaring. Samráðingar skulu verða, um annar parturin ynskir tað.

IV. *Fiskiloyvir*

Partarnir samdust um at loyvisreglurnar, sum eru í gildi fyri EEC-skip í 1983 skulu broytast í 1984 samsvarandi frásøgn dagfest 14. december 1983 viðvíkjandi loyvum.

V. *Rækjur*
Vísandi til ta faøroysku rækjukvotuna í grønlendskum sjógvi, samdust partarnir um, at samráðingar skulu vera fyri at endurskoða hesar kvotur, tá ið tær vísindaligu tilráðingarnar eru tøkar viðvíkjandi veiðuni fyri 1984, um so er, at síðstnevndu vísindaligu tilráðingar avvíkja munandi frá teim, ið vóru givnar fyri 1983.

VI. *Veiðu-hagtøl*
Samráðingarnevndirnar samdust um, at hvør partur skal geva mánaðarhagtøl fyri veiðu hjá skipum hansara á sínum fiskiøki. Tølini skulu gevast áðrenn endan av fylgjandi mánað.

*Bruxelles 14. december 1983.*

**P. Ellefsen**
Føroyska sendinevndin

**L.E. Andreasen**
EEC-sendinevndin

**Skjal 1 (síða 1)**

**Kvotur**

1. Hvør partur skal lata kvotur, sum nevndar eru niðanfyri, til hin partin á sóøki sínum:

1.1. Kvotur hjá EEC-skipum á føroyskum sjóøki.

| **Fiskasløg** | **Øki** | **Nøgd (tons)** |
|---|---|---|
| Toskur og hýsa | Vb | 1.200 |
| Upsi | Vb | 3.500 |
| Kongafiskur | Vb | 5.100 |
| Blálonga | Vb | 4.500 |
| Longa | Vb | 500 |
| Brosma | Vb | 400 |
| Flatfiskur | Vb | 660 |
| Svartkjaftur | Vb | 25.000 |
| Makrelur | Vb | 5.000 |
| Onnur fiskasløg | Vb | 500 |

**Skjal 1 (síða 2)**

1.2 Kvotur hjá føroyskum skipum í EEC-sjógvi

| **Fiskasløg** | **Fiskiøki ICES-øki ella NAFO-øki** | **Nøgd (tons)** | |
|---|---|---|---|
| Longa | VIb | 500 | (1) |
| Brosma | VIb | 500 | (1) |
| Blálonga | VIa(2), VIb | 1.100 | |
| Makrelur | IV (eystari stovnur) | | |
| Makrelur | VIa(2), VIIe,f,h (vestari stovnur) | 9.000 | |
| Sild | VIa(2) | 1.620 | |
| Hestamakrelur | IV, VIa(2), VIIe,f,h | 6.000 | |
| Hvítingsbróðir | IV, VIa(2) | 20.000 | (3)(4)(11) |
| Brislingur | IV, VIa(2) | 5.000 | |
| Nebbasild | IV | 10.000 | (3)(11) |
| Svartkjaftur | VIa(2), VIb, VII(5) | 45.000 | |
| Annar botnfiskur (bert hjáveiða) | IV, VIa(2) | 750 | |
| Sild | IIIaN (Skagerrak) (6) | 500 | |
| Rækjur | NAFO 1 (7) | 450 | (8) |
| Rækjur | XIV | 650 | (8) |
| Svartkalvi | NAFO 1 | 100 | |
| | XIV | 100 | |
| Kongafiskur | XIV | 400 | |
| Lodna | XIV | 7.000 | (10) |
| Hemari | Alt EEC-økið (undantikið NAFO 3PS) | 150 | (9) |

( 1) Hesar kvotur, ið skiftast kann ímillum, kunnu bert fiskast við línu.
( 2) Norðan fyri 56°30′ N.

( 3) Hvør av hesum kvotunum kann yvirfiskast við í mesta lagi 10.000 tonsum, treytað av at samlaða veiðunøgdin fyri hvítingsbróður (íroknað svartkjaft), nebbasild og brisling ikki fer upp um 35.000 tons.
( 4) Av hesum kunnu í mesta lagi 6.500 tons fiskast í ICES-økinum VIa norðan fyri 56°30'N, treytað av at EEC eftir áheitan fær gjølligar upplýsingar um veiðunøgd og samanseting av hjáveiðu.
( 5) Vestanfyri 12°V.
( 6) Avmarkað vestureftir av einari linju frá Hanstholm-vita til Lindesnes-vita, suðureftir av einari linju frá Skagen-vita til vitan í Tistlarna og haðani til nærmastu strond í Svøríki.
( 7) Sunnanfyri 68°N.
( 8) Fiskiskapur eftir serligum reglum, sum partarnir skulu ráðførast um.
( 9) Bert við línu.
(10) Henda kvota kann bert veiðast, um EEC loyvir sínum skipum at veiða av hesum stovni og frá tí degi, hetta loyvið verður givið.
(11) Veiðan av hvítingsbróður og nebbasild kann hava í sær hjáveiðu av svartkjafti, sum ikki slepst undan.

**Einsíðug yvirlýsing hjá føroysku sendinevndini**

Føroyska sendinevndin viðmerkti í, at noktan frá EEC at loyva føroyskum toskafiskiskapi í Eystur- og Vesturgrønlandi, meðan slíkur fiskiskapur verður loyvdur øðrum ikki grønlendskum fiskimonnum, var ikki hildið at vera í tráð við prinsippini í rammuavtaluni um sínámillum fiskiskap Føroyar/EEC.

Føroyska sendinevndin, ið minti á tann søguliga føroyska partin í veiðuni av Norðsjóvar sildini, segði frá síni ætlan um at biðja um samráðingar við EEC fyri at áseta eina kvotu til Føroyar, um so er, at sildaveiða verður uppafturtikin í ICES-øki IV í 1984.

Semja í brævalíki millum EEC øðrumegin og donsku stjórnina og Føroya Landsstýri hinumegin um laksafiskiskapin í Norð Atlantiskum sjógvi.

*A. Bræv frá Føroya Landsstýri*

Føroysku myndugleikarnir hava lagt sær í geyma, at EEC hevur sagt seg hava ampa av tí føroyska laksafiskiskapinum.

Føroya Landsstýri kann vátta, at føroysku myndugleikarnir hava átikið sær at gera hesar avmarkingar føroyska laksafiskiskapinum viðvíkjandi, um so er, at nøgdaravmarkingar ikki eru gjørdar sambært Norður Atlants laksasáttmálanum viðvíkjandi niðanfyri nevndu tíðarskeiðum.

1. Føroysku myndugleikarnir vilja skerja heildarveiðuna av laksi, veidd í føroyskum sjógvi (landleiðini), niður í 625 tons, fesk rundvekt, í veiðuskeiðinum, ið byrjar 1. oktober 1984 og endar 31. mai 1985.

2. Eingin laksafiskiskapur skal verða útintur uttanfyri veiðuskeiðið, sum umtalað undir petti 1.

Føroya Landsstýri biður EEC vátta, at tað er samt við omanfyristandandi.

*Við hávirðing*
*Føroya Landsstýri*

*B. Bræv frá EEC*

EEC hevur fingið skriv landsstýrisins dagfest í dag, sum er soljóðandi:

»Føroysku myndugleikarnir hava lagt sær í geyma, at EEC hevur sagt seg hava ampa av tí føroyska laksafiskiskapinum.

Føroya Landsstýri kann vátta, at føroysku myndugleikarnir hava átikið sær at gera hesar avmarkingar føroyska laksafiskiskapinum viðvíkjandi, um so er, at nøgdaravmarkingar ikki eru gjørdar sbrt. Norður Atlants laksasáttmálanum viðvikjandi niðanfyri nevnda tíðarskeiði.

1. Føroysku myndugleikarnir vilja skerja heildarveiðuna av laksi, veidd í føroyskum sjógvi (landleiðini), niður í 625 tons, fesk rundvekt, í veiðuskeiðinum, ið byrjar 1. oktober 1984 og endar 31. mai 1985.

2. Eingin laksafiskiskapur skal verða útintur uttanfyri veiðuskeiðið, sum umtalað undir petti 1.

Føroya Landsstýri biður EEC vátta, at tað er samt við omanfyristandandi.«

EEC sigur við hesum frá, at innihaldið í omanfyri nevnda skrivi er likið til eftirtektar.

*Við hávirðing*
*EEC*

**Skjal til løgtingsmál nr. 47/83:** **Skjal 10**

# Biograflóg og filmseftirlitslóg

## Álit frá nevndini til kannan av biografviðurskiftunum

Við skrivi dagfest 24. november 1981 hevur landsstýrið valt Jalgrim Hilduberg, fulltrúa, Eyðun Joensen, formann fyri Filmseftirlitinum, Karl Herup Olsen, filmsútleigara, Jógvan K. Jacobsen, biografleiðara, og Oskar Hermansen, biografleiðara, í eina nevnd at kanna biografviðurskiftini og seta fram uppskot til nýggja lóg um biografar.

Nevndin metti seg ikki kunna koma nóg skjótt við nøkrum samlaðum lógarupskoti og setti tí fram uppskot um fyribils at broyta galdandi lóg soleiðis, at innført varð eitt 12-ára aldursmark aftrat, umframt tað galdandi aldursmarkið uppá 16 ár. Hetta vildi lætta munandi um arbeiðið og útreiðslurnar hjá filmseftirlitinum og biografunum, tí hesi aldursmørk vórðu nýtt aðrastaðni, soleiðis at sensureringin í fleiri førum enn frammanundan kundi avgreiðast við tí skrivliga tilfarinum sum grundarlag.

Landsstýrið legði fram uppskot samsvarandi, sum varð viðtikið, samanber løgtingslóg nr. 82 frá 26. mai 1982.

Nevndin hevur seinni eisini fingið til uppgávu at viðgera spurningin um eina eftirlitsskipan við videofilmum, aftaná at tingið í løgtingsmáli nr. 75/1982: Eftirlit við videofilmum til útleigingar, hevði samtykt soljóðandi:

»Í samband við, at nevnd er sett at endurskoða biograflógina, heitir løgtingið á landsstýrið um at fyriskipa, at videofilmar til sølu og útleiging koma undir somu eftirlitsskipan, sum galdandi er fyri filmar til almenna framvísing.«

Galdandi lóg um biografar er lóg nr. 117 frá 13. apríl 1938 »om biografteatervæsenets ordning«, sum broytt við nevndu lóg nr. 82 frá 26. mai 1982, har innført varð eitt 12-ára aldursmark aftrat.

Lógin kann ikki sigast at hóska til føroysk viðurskiftir, og meginparturin av reglunum í lógini hevur ikki verið nýttur í Føroyum.

Seinastu árini hevur talið á áskoðarum í biografunum verið nógv minkandi. Áskoðaratalið hevur seinastu árini verið fylgjandi:

| | |
|---|---|
| 1982 | 108.787 áskoðarar |
| 1981 | 139.673 áskoðarar |
| 1980 | 183.932 áskoðarar |

Løgtingstíðindi 1983 B – 94/2

1979 ..... 265.780 áskoðarar
1978 ..... 316.865 áskoðarar

Áskoðaratalið er sostatt eftir 5 árum minkað niður í ⅓ og fleiri biohallir hava latið aftur.

Høvuðsorsøkirnar til niðurgongdina er økta talið av øðrum tilboðum innan undirhalds/mentunarøkið, herundir serstakliga frá sjónvarpinum.

Taka vit tølini sum her eru viðmerkt, so er afturgongdin í áskoðaratalinum sera álvarsom fyri biografarnar. Um vit bert taka samlaða áskoðaratalið fyri 1981-82, síggja vit eina minking uppá 31.000 áskoðarar. Týðiligt er at henda minkingin hendir mest tá ið sjónvarpsfeløgini eru farin at virka. Meðan biografarnir koma undir landsins eftirlit, eru feløgini eftirlitsleys og hava sostatt í fleiri førum sent filmir, sum biografarnir ikki fingu loyvi til. Tað er greitt, at biografarnir, sum frammanundan ikki eru væl staddir, tola ikki slíka minking í áskoðaratalinum, sum í ár helst er minkað uppaftur meir, orsakað av videonýtsluni, sum nú er komin afturat um alt landið. Higartil eru fleiri biografar sum nevnt givnir av vantandi vitjan. Viðvíkjandi tí siðmenningarliga, so hevur filmseftirlitið, síðani tað varð sett á stovn, havt gott árin á filmsúrvalið, verið biografunum ein góð leiðbeining í vali av filmum úr útlondum, og hevur tað verið mentunarliga væl betur. Men tað sær út sum at lættisoppurin í video tíverri vinnur á áskoðaravitjanini í biografunum og tí standa fleiri teirra ikki væl fíggjarliga og nakrir hava verið noyddir at steingja. Her treingir til at gera eitt líknandi alment stig sum við biofilmum til útleigan.

Av tí at filmseftirlitið eisini skal fevna um eftirlitið við videofilmum og øðrum filmum til útleigan og sølu og ikki sum nú bert við filmum til almennar fyrivísingar, heldur nevndin tað vera rættast at hava reglurnar í tveimum lógum, nevniliga eina lóg um vanligar reglur fyri biografar og eina lóg um eftirlitið og sum fevnir bert sum sensurering av vanligum biograffilmum og eftirlit við videofilmum og øðrum filmum til útleigan og sølu.

Undir núverandi skipan fer filmseftirlitsarbeiðið fram av fólki, sum er sett eftir fakligari ekspertisu. Tey bava øll vanligt dagsarbeiði. Ikki bert tí, men eisini vegna tess at filmsoperatørarnir eisini hava dagsarbeiði, fer øll sensureringin fram uttanfyri vanliga arbeiðstið. Tá tað heldur ikki ber til at totalsensurera filmar í biograftíð, fer eftirlitið av biofilmum fram fyri tað nógva um miðnátt (aftaná seinastu sýning) og mangan um vikuskifti, seinrapart leygardag/sunnudag.

Hetta ber í sær, at sjálvsagt er mark fyri tí ómaki, sum krevjast kann av filmseftirlitsnevnd og operatørum. Filmseftirlitið skal møta og møtir nærum altíð fakliga samlað, meðan operatørarnir býta tørnini millum sín.

Hóast tað er stríggið soleiðis at vera til arbeiðis scint á kvøldi og nærum hvørt vikuskifti, hevur tað higartil borið til hjá filmseftirlitinum at játta nærum øllum eftirlitssýningum til umbidna tíð av tí einfaldu orsøk, at brúkið av biolilmum í Føroyum er avmarkað, sum er, og tí at filmsútleigararnir/filmsinnflytararnir, sum er, eru í Havn og knýttir í praksis at teimum báðum Havnarbiografunum.

— Filmseftirlitið, filmsinnflytararnir og censurbiografarnir — hava við tíðini fingið eitt arbeiðslag, sum er praktiskt og hampiliga lætt og bíligt at umsita.

Sum er og higartil, er landsstýrið sloppið undan at seta kostnaðarmikla filmseftirlitsskrivstovu á stovn at umsita stovnin. Til umsiting eru játtaðar í løtuni umk. 25.000 kr. árlga, sum er ætlað til løn til formann + útreiðslur til skrivstovuhald o.t. Játtanin er seinastu árini bert vaksin við teimum 10% í vanl. prístals/dýrtíðarhækking.

Tá tað kortini sjáldan verður brúkt meira enn 50% av hesi upphædd, er orsøkin tann einfalda, at formanslønin á kr. 500 um mánaðin ongantíð er hækkað/regulerað síðani byrjað varð í 1976.

Samsýningin til nevndararbeiði (sjálva sensureringina) hevur seinastu árini støðugt ligið á umleið 130.000 kr., men fer at minka munandi í hesum fíggjarári vegna nýggju regluna frá landsstýrinum um fundarpening. Í longdini fer tó ikki at bera til at fáa fólk til arbeiðis á nátt og í vikuskiftum í so langa tíð uttan rímiliga samsýning.

Samanumtikið samsvarar núverandi játtan til filmseftirlitið væl við kostnaðin av filmseftirlitinum undir galdandi skipan.

*Um nýggja uppskotið til løgtingslóg um filmseftirlit* er at siga, at, um lógin bert fevndi um biograffilmar, so vildi skipanin nokk borið í sær eina lítla øking í filmseftirlitsfyrisitingini, men samstundis heldur færri totalsensureringar.

Mett verður tískil, at tað framyvir hevði borið til við galdandi arbeiðspraksis, og kostnaðurin hevði neyvan verið dýrari enn sum er.

Men lógaruppskotið fevnir eisini um *videofilmar*.

Sum er verður mett, at umleið 9.000 videofilmar eru til leigu ella sølu í Føroyum, og nær um hvørja viku vera nýggir videohandlar settir á stovn, harav teir nógvu á bygd.

Sambært lógaruppskotinum skal filmseftirlitið umframt biograffilmarnar hava eyguni eftir og skráseta allar hesar filmar, teir sum framyvir fara at verða fluttir inn og skráseta allar videofilmsútleigarar.

Her verður — og serstakliga í fyrstuni — talan um eitt *sera umfatandi skrásetingararbeiði*, sum filmseftirlitið neyvan fer at vera ført fyri at gera við núverandi umsiting.

Hinvegin verður tað mett at verða neyðugt, at *sama metingargrundarlag* fer at verða nýtt viðvíkjandi biograffilmum og videofilmum og tessvegna sama filmseftirlit. Tessvegna er tað í § 5, stk. 2 í nýggja lógaruppskotinum skotið upp, at tað verður filmseftirlitið (og ikki løgreglan einsamøll), sum eisini ansar eftir at § 234 í revsilógini verður yvirhildin, tá talan er um videofilmar til sølu ella útleiging.

Verður uppskotið samtykt í núverandi líki, fer eftirlitið av videofilmum í praksis uttan iva at bera í sær, at neyðugt verður at seta eina eftirlitsskrivstovu á stovn við einum fólki burturav at taka sær av tí umsitingarliga arbeiðinum (skráseting, katalogisering, merking og fyriskipan).

Harumframt má so roknast við einum filmseftirliti í núverandi líki við fakkønum fólki at taka sær av sjálvari sensureringini.

Kostnaðurin verður tískil mettur at vera ein heilt annar enn undir núverandi skipan.

Til tær einstøku greinirnar í lógunum skulu gerast hesar viðmerkingar:

**Løgtingslóg um biografar**

*Til § 1.* Uppskotið um at loyvi krevst til almennar filmsframvísingar, svarar til núgaldandi reglur. Skilað verður tó til, at reglurnar í lógini eisini eru galdandi fyri video-filmar. Í stk. 3 fær landsstýrið heimild til at áseta, at ávísar filmsfyrivísingar ikki krevja loyvi, t.d. kann hetta gerast galdandi fyri bókasøvn, feløg og samkomur, har eingin beinleiðis atgongupeningur verður kravdur. Tílíkar filmsfyrivísingar koma tó undir reglurnar í løgtingslógini um filmseftirlit.

*Til § 2.* Í galdandi lóg verður ikki kravt, at biografloyvir skulu lýsast leys, men hevur hetta verið gjørt. Eftir uppskotinum skulu nýggj loyvir, men ikki endurnýgging av loyvum, lýsast leys og umsóknirnar hava verið til ummælis hjá kommununi og løgregluni. Umframt ummæli til sjálva umsóknina krevst sjálvandi, at kommunalu byggimyndugleikarnir eftir vanligum reglum skulu geva byggiloyvi til ella góðkenna sjálvan biografbygningin eftir galdandi byggi- og brunalóggávu.

*Til § 3.* Loyvi til biografrakstur kunnu nú bert gevast kommunum, einstaklingum og meginfeløgum (landsfelagsskapum), hvørs virksemi kann sigast at vera av samfelagsnyttugum ella fólkamennandi týdningi. Eftir fyriliggjandi uppskoti kunnu loyvi gevast einstaklingum, feløgum, partafeløgum og sjálveigandi stovnum og sostatt ikki kommunum ella

landsstovnum. Eingin kann fáa meiri enn eitt biografloyvi, men hetta forðar ikki fyri, at ein loyvishavari kann fáa loyvi at býta biohøllina upp í fleiri hallir og sostatt vísa fleiri filmar samstundis.

*Til § 4.* Treytirnar fyri at fáa loyvi ella kunna góðkennast sum leiðari eru tær somu, sum nú eru galdandi. Reglurnar í stk. 2 eru nýggjar og svara til treytirnar í vinnulógini fyri at røkja aðrar vinnur.

*Til § 5.* Hesar reglur eru eisini í núverandi lóg og skulu tryggja at biografeigarin ella leiðarin frítt kunnu velja teir filmir, sum teir halda vera bestar.

*Til §§ 6-11.* Hesar greinir svara við minni broytingum í orðaljóðinum til reglur, sum finnast í galdandi lóg.

**Løgtingslóg um filmseftirlit**

Lógaruppskotið fevnir um filmir og videogrammir, ið verða víst alment. Undantak verður tó gjørt fyri sjónvarpssendingum, har roknað verður við, at stovnurin og nevndin sjálv fremja sítt eftirlit.

Umframt eftirlit við filmum, sum verða vístir alment, eru í lógini eisini tiknir við videofilmar, sum verða leigaðir út ella seldir til nýtslu, sum ikki kann metst at skula nýtast til almennar fyrivísingar.

Um forhondssensur hevur § 77 í grundlógini hesar reglur:

»Enhver er berettiget paa tryk, i skrift og tale at offentliggøre sine tanker, dog under ansvar for domstolene. Sensur og andre forebyggende forholdsregler kan ingensinde påny indføres.«

Forhondssensurur av tankum á prenti, í skrift og í talu er sostatt bannaður, meðan forhondssensurur av livandi myndum (filmum) og sjónleikum hevur verið mett at verið loyvdur. Forhondssensurering av sjónleikum hevur tó ikki verið framd í Føroyum.

Viðvíkjandi § 77 í grundlógini og eftirlit við videogrammum, ið verða seld ella útleigað til privata nýtslu her vil siga, at sum miðil má video samanberast við ljóðbond hvat viðvíkur taluni og film/sjónleik, hvat viðvíkur myndunum á videobandinum.

Undir orðini »í talu« eftir § 77 í grundlógini koma øll orð, sum eru søgd við menniskjarødd (eisini sangir) bæði um røddin hoyrist beinleiðis ella hoyrist gjøgnum teknisk tól so sum bandupptakarar, grammofonir o.t.

Talan á videobandinum er soleiðis umfatað av bannin um í § 77 um sensur, meðan eftirlit við myndunum er ikki umfatað av § 77, av tí at § 77 sum nevnd ikki er galdandi fyri myndatilfar, sum ikki er á prenti.

Bann kann sostatt ikki setast fyri taluni á videogrammum, uttan so at talan er ímóti lógarreglum, sum banna slíkari talu. Tílíkt bann kann

bert setast av rættinum og ikki av einum filmseftirliti.

Harafturímóti kann lóggevast um at bann kann setast av einum filmseftirliti fyri útleigan og sølu av videomyndum, tá livandi myndir sum nevnt ikki eru umfataðar av § 77 í grundlógini. Spurningurin er so, um heimastýrið hevur lóggávurættin á hesum øki, eins og við filmum til almennar sýningar, har økið er yvirtikið sum sermál.

Nevndin metir, at tær reglur sum skotnar eru upp um eftirlit við videofilmum og øðrum filmum til útleigan og sølu, §§ 6-8, mugu roknast sum vanligar reguleringar á privata vinnuøkinum (eitt krav um vørudeklaratión) sum er eitt yvirtikið øki og sostatt kann lóggevast um við løgtingslóg.

**Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:**

*Til § 1.* Eftir hesi § skulu allir filmar og videofilmar, ið verða vístir alment, frammanundan góðkennast av filmseftirlitinum. § svarar til § 1 í núverandi lóg um biografar, men er beinleiðis tilskilað, at lógin eisiui umfatar videofilmar. Sjónvarpssendingar verða ikki tiknar við her, tá ein serlig nevnd eftir galdandi lóg hevur eftirlit við tí, ið sent verður í sjónvarpinum.

*Til § 2.* Í galdandi lóg er einki tilskilað um, hvussu nógvir limir skulu vera í filmseftirlitinum, men er talið nú sett til 3 limir og 3 varalimir, harav ein skal vera løgfrøðingur og ein sálarfrøðingur og hava kunnleika til ungdóms- og barnatrupulleikar. Av tí at metingin av, um ein filmur kann sigast at vera ósømiligur ella vera óhóskandi fyri børn undir ein ávísan aldur, má byggja á ta til eina og hvørja tíð galdandi hugsan í samfelagnum, heldur nevndin, at eftirlitið ikki eigur at kunna sita í meira enn eitt ávíst tíðarskeið (12 ár). Krøvini til nevndarlimirnar samsvara við núverandi samanseting av eftirlitinum og hvat kravt verður í øðrum londum, t.d. Danmark.

*Til § 3.* Henda § svarar til § 21 í galdandi lóg, tó soleiðis at stk. 4 er nýtt.

*Til § 4.* Eftir núgaldandi reglum kann sensureringin føra til, at ein filmur verður góðkendur uttan nakrar viðmerkingar, at hann ikki verður góðkendur í heila tikið, ella at hann ikki má vísast fyri børnum undir 16 ella 12 ár.

Eftir uppskotinum er gjørd tann broyting frá galdandi sensurreglum, at filmir nú kunnu góðkennast soleiðis:

1) at filmurin verður góðkendur uttan nakra viðmerking,
2) at filmurin verður góðkendur uttan nakra viðmerking, men verður rátt frá at vísa hann fyri børnum undir 7 ár,

3) at filmurin ikki má vísast fyri fólki undir 18 ár ella børnum undir 12 ár,
4) at filmurin bert má vísast fyri fólki yvir 18 ár.

Nevndin heldur aldursmarkini 18 og 12 ár vera meira hóskandi enn 16 og 12 ár. Viðvíkjandi filmum, sum eftir nr. 4 kunnu vísast fyri fólki yvir 18 ár, t.v.s. myndug, metir nevndin, at her skuldi filmseftirlitið bert ansað eftir, at filmurin lýkur treytirnar í § 234 í revsilógini, t.v.s. ikki er pornografiskur.

*Til § 5.* Sum nevnt frammanfyri er nevndin eisini biðin um at gera uppskot til reglur, soleiðis at video-filmar koma undir sama eftirlit sum biograffilmar.

Nevndin hevur frá video-útleigarum fingið at vita, at í Føroyum í dag eru umleið 9.000 video-filmar í umfari, so tað verður ikki so lítið arbeiði av at hava eftirlit við hesum filmum.

Eftir tí, sum nevndin hevur fingið upplýst, eru ongar reglur um eftirlit við vidcobondum til útleigan ella sølu í Danmark ella Noregi. Í Svøríki er í 1981 viðtikin ein lóg, sum setur forboð fyri útleigan og sølu av videobondum við ógvisligum harðskapi, t.v.s. drúgvar lýsingar av at persónar verða fyri sadistiskum harðskapi.

Videofilmar og aðrir filmar, sum frá eftirlitinum skulu hava áskrift um, at teir eru hóskandi fyri fólk undir 18 ár ella børn undir 12 ár, mugu kannast eftir somu reglum sum biograffilmar.

Ynskir ein videohandlari bert at leiga ávísar filmar út til fólk yvir 18 ár, er eftir uppskotinum ikki neyðugt við nøkrum serstøkum eftirliti, tá tað ikki skuldi verið neyðugt við nøkrum sensuri uni ein filmur er skaðiligur ella ikki fyri fólki yvir hetta aldursmark, men hevur nevndin skotið upp, at filmseftirlitið við stakroyndum kannar, um videofilmir og aðrir filmir, ið bodnir verða út til sølu ella leigu, lúka treytirnar í § 234 í revsilógini um pornografi, og um neyðugt melda málið til løgregluna.

*Til § 6.* Fyri at filmseftirlitið skal kunna halda skil á, hvørjir selja ella útleiga videofilmar og aðrar filmar til ikki almennar framsýningar, er tað neyðugt at hesir lata seg skráseta hjá filmseftirlitinum. Tað kann heldur ikki vera rætt, at seljarar og útleigarar uttanlands skulu kunna leiga ella selja hesar til føroyskar brúkarar eftir linari reglum enn føroyskir handlandi. Tí er skotið upp, at hesir eisini mugu lata seg skráseta og at beinleiðis innflutningur av filmum uttanum skrásettar innflytarar ikki kann avgreiðast av tollvaldinum og sostatt mugu sendast retur. Hvussu henda regla verður at fyrisita og um hon kann haldast ella ikki, ella um hetta kann koma at elva til svartabørshandil við forbodnum filmum, er ilt at siga nakað um frammanundan.

*Til § 7.* Her verður hugsað um ítróttarfilmar, undirvísingarfilmar, reklamufilmar og aðrar líknandi filmar.

*Til § 8.* Eftir núgaldandi lóg kann gjald krevjast fyri kanning av filmum, men hevur hetta ikki verið gjørt. Ístaðin hevur biografeigarin víst filmirnar ókeypis fyri eftirlitinum. Uppskotið svarar til nýttu mannagongdina.

**Nevndin til kannan av biografviðurskiftunum**

Tórshavn, 13. desember 1983

**Eyðun Joensen** **Oskar Hermannsson** **Karl Herup Olsen**

**Jógvan Jacobsen** **Jalgrím Hilduberg**

# Uppskot

**til**

## løgtingslóg um biografar.

**§ 1.** Loyvi krevst til almennar framsýningar av biograffilmum, herundir videofilmum. Loyvi verður givið av landsstýrinum og er galdandi, antin til rakstur av biografhøll ella til einstakar framsýningar.

*2. stk.* Loyvið til rakstur av biografhøll er galdandi í 5 ár og gevur rætt til rakstur av biografi í eini ávísari kommunu.

*3. stk.* Landsstýrið kann avgera, at ávísar filmsframsýningar ikki krevja loyvi og kann áseta treytirnar.

*4. stk.* Loyvið er treytað av, at reglurnar í løgtingslóg um filmseftirlit verða hildnar.

## lagtingslov om biografer

**§ 1.** Offentlig forevisning af film, herunder videofilm, må kun ske efter tilladelse. Tilladelsen gives af landsstyret og gælder enten til fast biografdrift eller til enkeltforestillinger.

*Stk. 2.* Tilladelsen til fast biografdrift gælder i 5 år, og giver ret til biografdrift i en nærmere bestemt kommune.

*Stk. 3.* Landsstyret kan bestemme, at visse former for filmforevisning ikke kræver tilladelse, og kan fastsætte vilkårene herfor.

*Stk. 4.* Tilladelsen er betinget af, at bestemmelserne i lagtingslov om filmscensur overholdes.

**§ 2.** Loyvi til stovnan av nýggjari biografhøll verða givin aftaná, at loyvið hevur verið lýst leyst, og umsóknirnar hava verið til ummælis hjá kommununi og løgregluni.

**§ 3.** Loyvi kann gevast einstaklingum, felǿgum, partafelǿgum og sjálveigandi stovnum.

*2. stk.* Verður loyvi givið einum felag, partafelag ella stovni, skal leiðarin av biografhøllini góðkennast av landsstýrinum.

*3. stk.* Eingin kann fáa meira enn eitt biografloyvi. Landsstýrið kann tó geva undantaksloyvi.

**§ 4.** Loyvi ella góðkenning sum leiðari kann bert gevast persónum, sum
1) hava heimarætt,
2) hava bústað í Føroyum,
3) eru myndugir,
4) ikki eru undir trotabúðarviðgerð.

*2. stk.* Snýr tað seg um eitt felag ella stovn, skal felagið ella stovnurin hava heimstað í Føroyum og stjórarnir og meirilutin av nevndarlimunum hava lúkað treytirnar í stk. 1.

**§ 5.** Loyvishavarin (leiðarin) skal persónliga reka biografin og hevur listarligu ábyrgdina. Hann hevur skyldu til at ansa eftir, at vístir verða filmar, sum hava mest listarligt og mentunarligt virði. Hann má ikki av nakrari avtalu

**§ 2.** Tilladelse til oprettelse af ny biograf bliver givet efter, at tilladelsen har været annonceret ledig, og ansøgningerne har været til høring hos kommunen og politiet.

**§ 3.** Tilladelse kan gives enkeltpersoner, foreninger, aktieselskaber og selvejende institutioner.

*Stk. 2.* Bliver tilladelsen givet en forening, aktieselskab eller institution, skal biografchefen godkendes af landsstyret.

*Stk. 3.* Ingen kan få mere end en biograftilladelse. Landsstyret kan dog give dispensation.

**§ 4.** Tilladelse eller godkendelse som leder, kan kun gives personer, som
1) har indfødsret,
2) har bopæl på Færøerne,
3) er myndige,
4) ikke er under konkurs.

*Stk. 2.* Angår tilladelsen en forening eller institution, skal foreningen eller institutionen have hjemsted paa Færøerne og direktørerne og flertallet af bestyrelsesmedlemmerne opfylde betingelserne i stk. 1.

**§ 5.** Bevillingshaveren (lederen) skal personligt varetage biografens drift og bærer det kunstneriske ansvar. Denne har ved forevisning af film at drage omsorg for, at de kunstneriske og kulturelt mest værdifulde film forevi-

Løgtingstíðindi 1988 – 95

vera forðaður í frítt og óheft at ráða fyri filmsúrvali og annars at taka avgerð viðvíkjandi leiðsluni.

*2. stk.* Kann loyvishavarin (leiðarin) vegna sjúku ella av aðrari orsøk ikki reka biografin, kann landsstýrið góðkenna ein fyribilsleiðara.

ses. Han må ikke ved nogen aftale være forhindret i frit og uafhængigt at bestemme over biografens repertoire og øvrige ledelse.

*Stk. 2.* Såfremt bevillingshaveren (lederen) på grund af sygdom eller anden årsag er forhindret i at drive biografen, kan landsstyret godkende en foreløbig leder.

**§ 6.** Skúlar í kommununi og felløg, sum starvast við fólkaupplýsing, kunnu fáa biografhøllina til framvísingar av ljósmyndum til frama fyri upplýsing og undirvísing í teimum tíðum, tá loyvishavarin ikki ger nýtslu av henni. Fyri nýtsluna fær loyvishavarin sínar veruligu útreiðslur endurgoldnar, tó soleiðis, at endurgjaldið í hvørjum máli verður ásett av landsstýrinum.

**§ 6.** Skoler i kommunen og foreninger, der arbejder på folkeoplysningens grund, skal have adgang til uden for de tider, biografen benyttes til de almindelige forestillinger, at få den overladt til forevisning af film i undervisningens og oplysningens tjeneste. For benyttelse af lokalerne ydes der bevillingshaveren dækning for hans positive udgifter, således at godtgørelsen i tvivlstilfælde fastsættes af landsstyret.

**§ 7.** Loyvishavarin skal árliga senda landsstýrinum roknskap og frágreiðing um raksturin av biografhøllini.

**§ 7.** Bevillingshaver skal årligt indsende regnskab og afgive indberetning til landsstyret om biografens drift.

**§ 8.** Loyvi, ið er útgingið, kann endurnýggjast fyri 5 ár í senn aftaná at ummæli er fingið frá kommununi og løgregluni. Hevur loyvið verið nýtt á fullgóðan hátt, serstakliga hvat vali av filmum viðvíkur, eigur endurnýgging av loyvinum ikki at verða noktað, uttan so at tað eftir landsstýrisins meting fyriliggja heilt serstakar umstøður.

**§ 8.** Tilladelse, der udløber, kan fornyes for 5 år ad gangen efter indhentet udtalelse fra kommunen og politiet. Såfremt tilladelsen har været udnyttet på forsvarlig måde, særlig med hensyn til valg af films, bør fornyelse af tilladelse ikke nægtes, medmindre der efter landsstyrets skøn foreligger ganske særlige omstændigheder.

§ 9. Loyvi (góðkenning av leiðara) dettur burtur, tá ið loyvishavarin (leiðarin) ikki longur lýkur treytirnar í § 4. Tað kann til eina hvørja tíð takast aftur av landsstýrinum, um tað ikki verður nýtt, ella reglurnar í hesi lóg ella treytirnar fyri loyvinum eftir landsstýrisins meting ikki verða hildnar.

§ 10. Brot á § 1, stk. 1 í lógini, ella treytirnar í loyvinum, koma undir bót. Er brotið framt av einum felag ella tílíkum, kann felagið sjálvt koma undir bót.

§ 11. Henda lóg kemur í gildi 1. mai 1984. Samstundis fer úr gildi lóg nr. 117 frá 13. apríl 1938 »om biografteatervæsenets ordning« sum broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 26. mai 1982.

*2. stk.* Hann, sum áðrenn henda lóg kemur í gildi, hevur loyvi til rakstur av biografi, kann halda fram eftir higartil galdandi reglum, til loyvið gongur út.

§ 9. Tilladelsen (godkendelse som leder) bortfalder, hvis bevillingshaveren (lederen) ikke længere opfylder de i § 4 fastsatte betingelser. Den kan til enhver tid tilbagekaldes af landsstyret såfremt den ikke udnyttes, eller de i denne lov givne bestemmelser eller vilkårene for tilladelsen efter landsstyrets skøn ikke overholdes.

§ 10. Overtrædelse af lovens § 1, stk. 1, eller af betingelserne i tilladelsen, straffes med bøde. Sker overtrædelsen af en forening eller lignende, kan der pålægges foreningen bødeansvar.

§ 11. Denne lov træder i kraft 1. maj 1984. Samtidig ophæves lov nr. 117 af 13. april 1938 om biografteatervæsenets ordning som ændret ved lagtingslov nr. 82 af 26. mai 1982.

*Stk. 2.* Den, som før denne lov træder i kraft, havde tilladelse til at drive biograf, kan fortsætte efter de hidtil gældende regler, indtil tilladelsen udløber.

# Uppskot

## til

### løgtingslóg um filmseftirlit

§ 1. Allir filmar, ið verða vístir alment, skulu frammanundan góðkennast av filmseftirlitinum.

*2. stk.* Reglurnar í hesi lóg um filmseftirlit v.m. galda tilsvarandi fyri videofilmar ið verða vístir alment.

*3. stk.* Sjónvarpssendingar koma ikki undir reglurnar í 1. og 2. stk.

§ 2. Filmseftirlitið hevur 3 limir, harav 1 er løgfrøðingur og 1 sálarfrøðingur við serligum kunnleika til barna- og unglingatrupulleikar.

*2. stk.* Limirnir og teirra varamenn verða útnevndir av landsstýrinum fyri 4 ár. Eingin kann veljast aftur meira enn tvær ferðir.

*3. stk.* Landsstýrið kann áseta eina starvsskipan fyri eftirlitið.

§ 3. Eftirlitið má ikki góðkenna filmar, um so er, at teir verða mettir at vera siðspillandi, ósømiligir, ella elva til harðskap, mett eftir tí aldursbólki, teir eru góðkendir at kunna vísast fyri.

*2. stk.* Filmar, sum eftirlitið metir hava skaðiliga ávirkan á sinnalag ella rættarhugsan hjá ungdómi og børnum, mugu ikki

### lagtingslov om filmcensur

§ 1. Enhver film, der forevises offentligt, skal forinden godkendes af filmcensuren.

*Stk. 2.* Denne lovs bestemmelser om filmcensur finder tilsvarende anvendelse for videofilm, der forevises offentligt.

*Stk. 3.* Fjernsynsudsendelser omfattes ikke af bestemmelsen i stk. 1 og 2.

§ 2. Filmcensuren består af 3 medlemmer, hvoraf 1 er jurist og en psykolog med speciel indsigt i børne- og ungdomsproblemer.

*Stk. 2.* Medlemmerne og stedfortrædere udnævnes af landsstyret for 4 år. Ingen kan genudnævnes mere end 2 gange.

*Stk. 3.* Landsstyret kan fastsætte en forretningsorden for filmcensuren.

§ 3. Cencuren må ikke godkende film, såfremt de skønnes at være moralskt nedbrydende at krænke ærbarheden eller forårsage vold, vurderet i forhold til de aldersgrupper, de er godkendt til at kunne forevises for.

*Stk. 2.* Film, som censuren anser for egnede til på skadelig måde at påvirke ungdoms og børns

góðkennast at verða vístir fyri fólki undir 18 ella børnum undir 12 ár.

*3. stk.* Móti almennum vegi ella í hølum, sum almenningurin hevur atgongd til, mugu bert tílíkar reklamumyndir vísast, sum filmseftirlitið hevur góðkent og sett sítt stempul á.

*4. stk.* Er filmur bannaður fólki undir 18 ár ella børnum undir 12 ár ella mettur óhóskandi fyri børn undir 7 ár, skal hetta verða kunngjørt við uppslagi á týðiligan hátt og fráboðað í lýsingum um avvarðandi filmsframsýning.

sind eller retsbegreber, må ikke godkendes til forevisning for personer under 18 eller børn under 12 år.

*Stk. 3.* På eller ud mod offentlig gade eller i offentligt tilgængeligt lokale, må kun sådanne reklamebilleder vises som censuren har godkendt og forsynet med sit stempel.

*Stk. 4.* Er film forbudt for personer under 18 år eller børn under 12 år eller frarådes den for børn under 7 år skal dette bekendtgøres ved tydelige opslag eller tilkendegives i annoncering af de pågældende filmforevisninger.

**§ 4.** Filmar kunnu góðkennast á fylgjandi hátt:

1) at filmurin verður góðkendur uttan nakra viðmerking,
2) at filmurin verður góðkendur uttan nakra viðmerking, men verður rátt frá at vísa hann fyri børnum undir 7 ár,
3) at filmurin ikki má vísast fyri fólki undir 18 ár ella børnum undir 12 ár,
4) at filmurin bert má vísast fyri fólki yvir 18 ár.

Góðkenningin kann eisini vera treytað av, at nærri tilskilaðar myndir ella partar av filminum verða kliptir burtur.

*2. stk.* Fyri hvønn kannaðan film gevur eftirlitið eina váttan (censurkort).

**§ 4.** Filmsforevisninger kan godkendes på følgende måde:

1) at filmen godkendes uden nogen begrænsning,
2) at filmen godkendes uden nogen begrænsning, men frarådes for børn under 7 år,
3) at filmen ikke må forevises for personer under 18 år eller børn under 12 år,
4) at filmen kun må vises for personer over 18 år.

Godkendelse kan endvidere betinges af, at nærmere angivne billeder eller afsnit af filmen bortklippes.

*Stk. 2.* For hver film, der har været bedømt af censuren, udfærdiges et bevis (censurkort).

**§ 5.** Videofilmar og aðrir filmar, sum ikki verða vístir alment, men sum verða leigaðir út ella seldir, skulu hava áskrift frá filmseftirlitinum, og við tilskilan um teir er hóskandi at verða vístir fyri persónum undir 18 ár ella børnum undir 12 ár. Teir mugu ikki leigast út ella seljast til fólk undir tilskilaðan aldur.

*2. stk.* Filmseftirlitið hevur skyldu til við stakroyndum at kanna, um videofilmar og aðrir filmar, ið verða bodnir út til sølu ella leigu, lúka treytirnar í § 234 í revsilógini, og verður mett at reglurnar ikki verða hildnar, at melda málið til løgregluna.

**§ 6.** Persónar og feløg, ið selja ella útleiga videofilmar og aðrar filmar til persónar, feløg, stovnar v.m. í Føroyum, skulu lata seg skráseta hjá filmseftirlitinum.

*2. stk.* Videofilmar, ið verða innfluttir til Føroya uttan um skrásettar útleigarar ella seljarar, kunnu ikki verða avgreiddir av tollvaldinum.

*3. stk.* Reglurnar í 1. og 2. stk. eru ikki galdandi fyri videofilmar og aðrir filmar, sum skúlar og aðrir almennir stovnar innflyta til nýtslu til egnar framsýningar.

**§ 7.** Filmseftirlitið kann eftir nærri ásettum treytum geva vinnufyritøkum, stovnum og feløgum standandi loyvi at innflyta ítróttarfilmar, reklamufilm-

**§ 5.** Videofilm og andre film, der ikke forevises offentligt, men som bliver udlejet eller solgt, skal hava påskrift fra censuren og med angivelse af om de er egnede til forevisning for personer under 18 år eller børn under 12 år. De må ikke udlejes eller sælges til personer under nævnte aldersgrænser.

*2. stk.* Filmcensuren har pligt til ved stikprøver at efterse om videofilm og andre film, der udbydes til salg eller leje, opfylder kravene i § 234 i straffeloven. Anser den, at reglerne bliver overtrådt, skal dette anmeldes til politiet.

**§ 6.** Personer og selskaber, der sælger eller udlejer videofilm og andre film til personer, foreninger eller institutioner m.v. på Færøerne, skal lade sig registrere hos filmcensuren.

*Stk. 2.* Videofilm, der importeres til Færøerne uden om registrerede udlejere eller sælgere må ikke ekspederes af toldvæsenet.

*Stk. 3.* Bestemmelserne i stk. 1 og 2 gælder ikke videofilm og andre film, som skoler og andre offentlige institutioner importerer til egne forevisninger.

**§ 7.** Filmcensuren kan på nærmere fastsatte vilkår give erhvervsvirksomheder, institutioner og foreninger varig tilladelse til at indføre idrætsfilm, reklamefilm

ar og líknandi filmar uttan at hesir skulu kannast.

*2. stk.* Egnar video- og filmsupptøkur, sum ferðandi hava við sær sum viðføri til Føroya ella sum hava verið til framkalling uttanlans, koma ikki undir reglurnar í hesi lóg.

og lignende film, uden at disse skal censureres.

*Stk. 2.* Egne video- og filmoptagelser, som rejsende har med sig som baggage til Færøerne, eller som har været til fremkaldelse udenlands, kommer ikke under bestemmelserne i denne lov.

**§ 8.** Kanning og góðkenning av filmum er ókeypis, men hava filmsútleigarar/eigarar skyldu til ókeypis at vísa filmin fyri eftirlitinum.

*2. stk.* Filmseftirlitið kann krevja at fáa allar neyðugar upplýsingar og frágreiðingar um innihaldið í filminum.

**§ 8.** Censurering af film er gratis, men filmsudlejer/ejer har pligt til gratis at vise censuren filmen.

*Stk. 2.* Filmcensuren kan kræve alle nødvendige oplysninger og forklaringer om indholdet i filmen.

**§ 9.** Landsstýrið kann seta nærri reglur um, hvussu eftirlitið eftir hesi lóg skal fremjast.

**§ 9.** Landsstyret kan fastsætte nærmere regler for censurens gennemførelse efter denne lov.

**§ 10.** Brot á reglurnar í hesi lóg ella reglur ásettar við heimild í hesi lóg verða revsað við bót. Er brotið framt av einum felag ella líknandi, kann felagið sjálvt koma undir bót.

*2. stk.* Undir viðgerðini av málinum eftir hesi lóg verða reglurnar í kapitlunum 68 og 69 í rættargangslógini nýttar í sama mun sum í statsadvokatmálum.

**§ 10.** Overtrædelse af denne lov eller bestemmelser fastsat i henhold til denne lov straffes med bøde. Er overtrædelsen begået af et selskab eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar.

*Stk. 2.* Ved behandlingen af sager efter denne lov anvendes reglerne i lov om rettens pleje, kapitlerne 68 og 69, i samme omfang som i sager, der påtales af statsadvokaten.

**§ 11.** Henda lóg kemur í gildi 1. mai 1984.

**§ 11.** Denne lov træder i kraft 1. maj 1984.

# ÁLIT

**viðv.**

**lóg um matvørur v.m. í Føroyum.**

Í skrivi frá 4. mai 1977, F.L.j.nr. 916-6, boðar landsstýrið frá, at tað hevur samtykt at seta ein arbeiðsbólk at viðgera tvey lógaruppskot, nevniliga:

1. »Forslag til næringsmiddellov« og

2. »Forslag til lov om drikkevand, vandforsyning til næringsmiddelbedrifter m.m. og vandforsyningsanlæg«,

sum eru send landsstýrinum av Brynjulf Melhuus, deildardjóralækna, í november 1975 saman við »Betænkning om næringsmiddelkontrol på Færøerne«.
Í nevnda arbeiðsbólk hevur landsstýrið samtykt at seta:

Jákup Mørkøre, verkfrøðing,
Dánjal J. Bærentsen, landsdjóralækna,
H.D. Joensen, landslækna,
Johan Djurhuus, skrivstovustjóra.

Í skrivi frá 29. august 1977 boðar landsstýrið frá, at tað eftir tilmæli frá Tórshavnar heilsunevnd hevur valt M. Nepper-Christensen, landfúta, sum lim í arbeiðsbólkin, og í skrivi frá 21. november 1979 sigur landsstýrið frá, at tað eftir tilmæli frá arbeiðsbólkinum sjálvum hevur valt Justinus Olsen, deildardjóralækna, sum lim. Seinast hevur landsstýrið í skrivi frá 14. februar 1980 boðað frá, at tað eftir áheitan frá Brúkarafelagnum hevur samtykt, at felagið fær eitt umboð í umrødda bólki, og felagið hevur síðan 12. mars 1980 verið umboðað av Sigrid Dalsgaard, formanni í Brúkarafelagnum.

Arbeiðsbólkurin helt sín fyrsta fund á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni 12. november 1979 og skipaði seg við Dánjal J. Bærentsen sum formanni, meðan Jákup Mørkøre hevur verið skrivari síðan, og Justinus Olsen hevur gjørt fyribilsuppskot til tann føroyska lógartekstin.

Við tað, at H. D. Joensen, landslækni, skjótt skuldi fara úr embætinum, samdist bólkurin um, at hetta embætið skuldi vera umboðað í

bólkinum við setta og síðan tilnevnda landslækna Høgna Debes Joensen.

Bólkurin hevur hildið 28 fundir.

Á teim fyrstu fundunum varð talað um uppskotini, sum landsstýrið hevði sett bólkin at arbeiða við. Bólkurin tók ta avgerð at brúka ta nýggju donsku matvørulógina, »Lov nr. 310 af 6. juni 1973 om levnedsmidler m.m.« við seinni broytingum sum fyridømi í høvuðsheitum, men tillagað serligum føroyskum viðurskiftum. Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingarnar til ta donsku lógina, meðan bólkurin hevur sínar viðmerkingar til allar lógargreinirnar í tí føroyska uppskotinum, sum víkja frá tí donsku lógini.

Uppskotið er ein heimildar- og ramnulóg, sum fatar um alt, ið er ætlað fólki at eta og drekka, og tað er soleiðis tillagað, at tað ber til at gera reglur fyri eitt nú vatnveitingum, kjøti og kjøtúrdráttum, mjólk og mjólkaúrdráttum, margarini, eggum, flogfenaði, fiski og fiskaúrdráttum o.a.m., sum ongar ella bert ófullfíggjaðar lógir og reglur eru um frammanundan her á landi mótsett aðrastaðni.

Eftir tí føroysku lógarskránni frá 1980 eru hesar lógir við samsvarandi kunngerðum og fyriskipanum galdandi, men fara úr gildi smbrt. § 55:

1) Lóg nr. 125 frá 14. apríl 1905 »om forbud mod anvendelse af kunstige sødestoffer«.
2) Lóg nr. 108 frá 18. apríl 1910 »om undersøfelse af levnedsmidler m.m.«, sum broytt við lóg nr. 664 frá 15. desember 1920 og lóg nr. 127 frá 15. apríl 1930.
3) Løgtingslóg nr. 24 frá 6. mai 1965 um eftirlit við virking og útflutningi av frystum fiski til matna, sum broytt við løgtingslóg nr. 6 frá 14. januar 1974.
4) Løgtingslóg nr. 41 frá 22. juni 1972 um løggilding av virkjum og fiskiførum til framleiðslu av mati, sum broytt við løgtingslóg nr. 29 frá 1. juni 1978.

Eftir hesum uppskoti til eina matvørulóg verða heimildir til at seta reglur í verk við kunngerðum, reglugerðum og umfarsskrivum so hvørt, sum tørvur verður.

Bólkurin ásannar, at tað verður ómøguligt at gera generellar reglur fyri alt. Tað verður tí í mongum førum í teim einstøku lógargreinunum heimilað landsstýrinum at taka avgerðir í einstøkum málum, sum kunnu taka seg upp, og sum ikki eru greiniliga lýst í ásettum reglum.

Lagtingstíðindi 1980/81 – A

Eftir áheitan sendi Standens Levnedsmiddelinstitut tvey umboð, civ. ing. Mette Bjørn og souchef cand. jur. Aase Koushede, upp higar at ráðleggja bólkinum. Hesi fólk vóru her og á fundum við bólkinum í døgunum 10. og 11. september 1980 og veittu mangar hentar leiðbeiningar eftir teim royndum, sum tey høvdu frá tí donsku matvørulógini, síðan hon kom í gildi.

**Kostnaður**

Um nærri fyriskipanir fyri hesa veiðu verður samband millum Føroya Landsstýri og íslendska fiskimálaráðið. Í aðrar mátar verður fylgt teimum fyriskipanum og reglum, sum vórðu ásettar í samráðingum um sínamillum fiskiveiðirættindi føroyinga og íslendinga, sum undirritaðar vóru 10. januar 1979.

Reykjavík, 9. mars 1984.

Staðfest:

*Pauli Ellefsen* — *Geir Hallgrímsson*

*Anfinn Kallsberg* — *Halldór Asgeirsson*

Skjal til løgtingsmál nr. 89

# Løgtingslóg um vernd av dýrum

## Álit frá arbeiðsbólkinum at kanna dýraverndarlógina

*Januar 1984*

# Uppskot
# til

## løgtingslóg um vernd av dýrum

## 1. kapittul
## Viðferð av dýrum.

§ 1. Dýr skulu viðfarast forsvarliga og skulu ikki av vanrøkt, overving ella á annan hátt vera fyri óneyðugari líðing.

§ 2. Hvør, sum heldur dýr, skal syrgja fyri, at dýrið fær nóg mikið og hóskandi fóður og drekka, og at tað í aðrar mátar verður hildið og røkt forsvarliga, herundir at tilhaldsrúm hjá dýrinum er forsvarliga innrættað.

§ 3. Ikki er loyvt:
1. við helsi, tjóðri ella øðrum útbúningi at tarna dýri í rørsluni soleiðis, at hetta elvir dýrinum pínu ella hindrar tí at fáa neyðturviliga hvíld,
2. at sláa dýr við lutum, ið eru skikkaðir at valda dýrinum ábrek ella svára pínu,
3. at svíða ullina av dýrum í staðin fyri at royta, klippa ella fyri at drepa ótoy,

## lagtingslov om værn for dyr

## Kapitel 1.
## Behandling af dyr.

§ 1. Dyr skal behandles forsvarligt og må ikke ved vanrøgt, overanstrengelse eller på anden måde udsættes for unødig lidelse.

§ 2. Enhver, der holder dyr, skal drage omsorg for, at dyret får tilstrækkeligt og egnet foder og drikke, og at det iøvrigt passes og plejes forsvarligt, herunder at dets opholdsrum er forsvarligt indrettet.

§ 3. Det er ikke tilladt:
1. ved bindsel, tøjr eller anbringelse af andre indretninger at hæmme dyrs bevægelsesfrihed på en måde, der volder dyret smerte eller hindrer det i at opnå fornøden hvile,
2. at slå dyr med genstande, der er egnede til at volde dyret beskadigelser eller stærke smerter,
3. at anvende afsvidning af dyrs hårlag i stedet for klip-

4. at seta nagla, ståltráð ella líknandi í rennilin á svínum fyri at hindra teimum í at róta í jørðini. Har aftur í móti er loyvt at nýta slættar ringar og agraffir fyri at hindra svínum at róta í jørðini,
5. í samband við at avloysa dýr við burð at nýta krafttól og rossadrátt at taka burðin,
6. at benda horn á scyði við nakkaspenni, fjaðrastáli ella á annan hátt,
7. at tvangsfóðra dýr við gøðing í hyggju,
8. at nýta livandi dýr til mál við skjótivenjing og -kapping,
9. at skjóta kóp og onnur størri dýr við høgli og
10. at stinga, skutla ella høgga grindalivalir ella aðrar smærri hvalir, uttan so at sýslumaðurin ella grindaformaðurin í serligum førum hevur givið loyvi til hetta.

§ 4. Heldur ikki er loyvt:
1. at flyta livandi fisk við at seta stengur, viðjur, krókar ella snøri gjøgnum toknur, kjaft ella líknandi,
2. við viðing av livandi fiski at krøkja vektarkrókar í nakran part av fiskinum, og

3. at anvende afsvidning af dyrs hårlag i stedet for klipning eller for at dræbe utøj,
4. at sætte søm, ståltråd eller lignende i trynen på svin for at hindre dem i at rode i jorden. Det er derimod tilladt at anvende glatte ringe og agraffer til at hindre svin i at rode i jorden,
5. ved fortøsning af dyr at anvende kraftmaskiner og hestetræk til udtrækning af fosteret,
6. at afbøje fårs horn med nakkespænde, fjederstål eller på anden måde,
7. at tvangsfodre dyr i fedningsøjemed,
8. at anvende levende dyr som mål ved øvelses- og kapskydninger,
9. at skyde sæler og andre større dyr med hagl og
10. at stikke, harpunere eller hugge grindehvaler eller andre småhvaler, medmindre sysselmanden eller grindeformanden i særlige tilfælde har givet tilladelse hertil.

§ 4. Det er endvidere ikke tilladt:
1. at transportere levende fisk ved hjælp af stænger, vidjer, kroge eller snore, anbragt gennem gællerne, kæberne eller lignende,
2. ved vejning af levende fisk at stikke den til vægtredskabet

3. at nýta onnur livandi geisladýr enn fisk til agn.

§ 5. Verpingarbúr kunnu einans nýtast við loyvi frá landsdjóralæknanum. Loyvini verða givin fyri 5 ár í senn.

*2. stk.* Landsstýrið ásetur nærri reglur ella tekur avgerð um treytirnar fyri loyvinum og um hald og røkt av dýrunum.

*3. stk.* Landsstýrið kann áseta nærri reglur ella taka avgerð um innrættingina, raksturin og nýtsluna av øðrum framleiðsluháttum av eggum enn tí í 1. og 2. stk. nevnda.

*4. stk.* Landsdjóralæknin kann taka eitt loyvi til at nýta verpingarbúr aftur, um groft ella endurtikið brot er gjørt á treytirnar fyri loyvinum ella á reglurnar fyri haldið og røktina av dýrinum.

*5. stk.* Avgerðir, tiknar eftir 1. og 4. stk., kunnu ikki leggjast fyri annan umsitingarligan myndugleika.

§ 6. Ross, um hvørji váttan frá djóralækna er til skjals um, at tey antin eru útslitin ella vegna aldur, varandi, ólekilig brek ella álvarsligar óvanar eru óhóskandi til brúks, og ross, sum eru avhandað ella afturgoldin av tryggingarfeløgum sum ólekilig og óhóskandi til brúks, skulu

hørende krog gennem nogen del af dyret og

3. at bruge andre levende hvirveldyr end fisk som agn.

§ 5. Æglægningsbure må kun anvendes med tilladelse fra landsdyrlægen. Tilladelserne meddeles for 5 år ad gangen.

*Stk. 2.* Landsstyret fastsætter nærmere regler eller træffer afgørelse om vilkårene for tilladelse og om dyrenes pasning og pleje.

*Stk. 3.* Landsstyret kan fastsætte nærmere regler eller træffe afgørelse om indretningen, driften og anvendelsen af andre ægproduktionssystemer end det i stk. 1 og stk. 2 nævnte.

*Stk. 4.* Landsdyrlægen kan tilbagekalde en tilladelse til at anvende æglægningsbure, såfremt der er sket grov eller gentagn overtrædelse af vilkårene for tilladelsen eller af reglerne om dyrenes pasning og pleje.

*Stk. 5.* Afgørelser, der træffes i henhold til stk. 1 og stk. 4, kan ikke indbringes for anden administrativ myndighed.

§ 6. Heste, om hvilke der foreligger erklæring fra dyrlæge om, at de enten er udslidte eller på grund af alder, kroniske, uhelbredelige lidelser eller fremtrædende unoder er uegnede til brug, samt heste, som er overtagne eller erstattede af forsikringsselskaber som uhelbredelige

ikki handast ella ognast til annað endamál enn til sláturs, uttan so, at landfútin gevur viðurkenning um avhandingina, ella at hon fer fram í samband við, at avvarðandi eigindómur ella virki verður avhandað.

§ 7. Dýr kunnu ikki verða vand til framsýning, sirkussýning, filmsupptøku ella líknandi, um hetta elvir dýrinum mein ella álvarsliga pínu.

*2. stk.* Villini dýr kunnu ikki verða nýtt til framsýning í sirkus, variete og líknandi vinnu. Framsýning av dýrum í ferðandi dýrasøvnum er ikki loyvd.

*3. stk.* Dýragarðar, dýralundir og líknandi kunnu ikki setast á stovn uttan loyvi frá landfútanum. Landsstýrið kann gera nærri reglur um eftirlit við slíkari vinnu og um tilhaldsrúm og búr v.m. hjá dýrunum.

*4. stk.* Landfútin kann geva undantaksloyvi frá avgerðini í 2. stk., 1. punktum.

og uanvendelige til brug, må ikke overdrages eller erhverves til andet formål end slagtning, medmindre landfogeden meddeler samtykke til overdragelsen, eller denne sker i forbindelse med overdragelse af den ejendom eller virksomhed, ved hvilken hesten benyttes.

§ 7. Dyr må ikke dresseres eller bruges til fremvisning, cirkusforestillinger, filmsoptagelser eller lignende, såfremt dyret herved påføres skade eller alvorlig smerte.

*Stk. 2.* Vilde dyr må ikke anvendes ved forestillinger i cirkus, varieteer og lignende virksomheder. Fremvisning af dyr i omrejsende menagerier må ikke finde sted.

*Stk. 3* Zoologiske haver, dyreparker og lignende må ikke oprettes uden landfogedens tilladelse. Landsstyret kan give nærmere forskrifter om tilsyn med sådanne virksomheder og om dyrenes opholdsrum, bure m.v.

*Stk. 4.* Landfogeden kan meddele undtagelse fra bestemmelserne i stk. 2, 1. punktum.

## 2. kapittul
## Avlíving og skurðvilgerð v.m.

§ 8. Tann, sum ætlar at avlíva eitt dýr, skal vissa sær, at dýrið

## Kapitel 2
## Aflivning og operative indgreb m.v.

§ 8. Den, der vil aflive et dyr, skal sikre sig, at dyret dræbes så

verður dripið so skjótt og pínuleyst sum gjørligt. Størri dýr, serliga ross og neyt, sum vegna ábrek, herundir beinbrot, mugu avlívast, kunnu ikki flytast til sláturs, men skulu avlívast á staðnum.

**§ 9.** Gelding av dýrum kann bert gerast av djóralækna og skal gerast undir nýtslu av doyving.

*2. stk.* Gelding av hundum og kattum má bert verða gjørd, um tað er heilsuliga áneyðugt.

*3. stk.* Gelding av grisum og kálvum, sum ikki eru meira enn 1 mánað gamlir, kann verða gjørd av øðrum enn djóralæknum og uttan nýtslu av doyving, tá loyvi er fingið frá landsdjóralæknanum fyri hesum.

*4. stk.* Avgerðir eftir 3. stk. kunnu ikki leggjast fyri annan umsitingarligan myndugleika.

hurtigt og så smertefrit som muligt. Større dyr, særlig heste og kvæg, der på grund af tilskadekomst, herunder benbrud, skal aflives, må ikke transporteres til slagtning, men skal dræbes på stedet.

§ 9. Kastration af dyr må kun foretages af en dyrlæge og skal finde sted under anvendelse af bedøvelse.

*Stk. 2.* Kastration af hunde og katte må kun ske, hvis det af helbredsmæssige hensyn er påkrævet.

*Stk. 3.* Kastration af grise og kalve, der ikke er over 1 måned gamle, kan foretages af andre end dyrlæger og uden anvendelse af bedøvelse, når der foreligger tilladelse fra landsdyrlægen.

*Stk. 4.* Afgørelser i henhold til stk. 3 kan ikke indbringes for anden administrativ myndighed.

**§ 10.** At kuta halan av rossum og neytum og oyrunum og halan av hundum kann bert verða gjørt, um tað er heilsuliga áneyðugt. Hetta kann bert gerast av djóralækna og skal gerast undir nýtslu av doyving.

**§ 10.** Kupering af halen på heste og køer og af ørerne og halen på hunde må kun ske, hvis det af helbredsmæssige hensyn er påkrævet. Den må kun foretages af en dyrlæge og skal finde sted under anvendelse af bedøvelse.

**§ 11.** At taka horn av dýri kann bert verða gjørt, um tað er heilsuliga ella vinnuliga áneyðugt. Hetta kann bert gerast av djóralækna og skal gerast undir

§ 11. Fjernelse af horn på dyr må kun ske, hvis det af helbredsmæssige eller driftsmæssige hensyn er påkrævet. Den må kun foretages af en dyrlæge og

nýtslu av doyving.

*2. stk.* At taka knavar av kálvum, sum ikki eru meira enn 1 mánað gamlir, kann gerast av øðrum enn djóralækna, tá ið loyvi er fingið frá landsdjóralæknanum fyri hesum.

*3. stk.* Avgerðir eftir 2. stk. kunnu ikki leggjast fyri annan umsitingarligan mynduleika.

skal finde sted under anvendelse af bedøvelse.

*Stk. 2.* Fjernelse af hornanlæg på kalve, som ikke er mere end 1 måned gamle, kan foretages af andre end dyrlæger, når der foreligger tilladelse fra landsdyrlægen.

*Stk. 3.* Afgørelser i henhold til stk. 2 kan ikke indbringes for anden administrativ myndighed.

**§ 12.** Aðrar skurðviðgerðir hjá dýrum enn tær í §§ 9-11 nevndu, sum kunnu elva dýrinum líðing, undantikið smávegis og stuttvarandi pínu, kunnu bert gerast av djóralækna, uttan so, at viðgerðin kann ætlast at vera bráðneyðug.

**§ 12.** Andre operative indgreb på dyr end de i §§ 9-11 omhandlede, der kan påføre dyret lidelse, bortset fra uvæsentlig smerte af rent forbigående beskaffenhed, må kun foretages af en dyrlæge, medmindre behandlingens iværksættelse må anses for uopsættelig.

## 3. kapittul
## Eftirlit við, at lógin verður hildin v.m.

## Kapitel 3.
## Tilsyn med lovens overholdelse m.v.

**§ 13.** Hann, sum kemur fram á eitt dýr, ið er eyðsýnt sjúkt, skatt ella hjálparleyst, hevur skyldu eftir førimuni at veita dýrinum hjálp.

*2. stk.* Vegfarandi skulu hava fyrilit og ávísa varsemi við dýrum, ið eru á ella við veg. Við ákoyring eru ásetingarnar í 1. stk. galdandi.

**§ 13.** Den, der kommer frem til et dyr, som er øjensynligt sygt, skadet eller hjælpeløst, har pligt til efter evne at yde dyret hjælp.

*Stk. 2.* Trafikanter skal optræde hensynsfuldt og udvise agtpågivenhed over for dyr, der færdes på eller ved vej. Ved påkørsel gælder bestemmelserne i stk. 1.

**§ 14.** Um eitt dýr av undirfóðring er so avmergjað, ella av-

**§ 14.** Såfremt et dyr på grund af underernæring er så afmagret el-

maktað, at støðan hjá tí er óforsvarlig, kann løgreglan við eini dagligari bót áleggja eigaranum ella tí, sum hevur dýrið í hondum, at gera tiltak til, at dýrið verður fóðrað forsvarliga. Harafturat kann løgreglan, um fóðringarstøðan ella heilsustøðan hjá dýrinum ger tað neyðugt, somuleiðis við at áleggja dagligar bøtur forbjóða brúk av tí fyri eitt tíðarskeið upp til 2 mánaðir, og hendan freistin kann framleingjast, tó bert fyri 2 mánaðir í senn. Nevndu álegg, sum bert kunnu setast í verk eftir umbidnari váttan frá djóralæknа, skulu vera til skjals skrivliga og fevna um tað á 2. stk. nevndu freist fyri at leggja málið fyri landsdjóralæknan.

*2. stk.* Tann, sum fær álegg eftir 1. stk., kann krevja spurningin, um grundarlag er fyri álegginum, lagdan fyri landsdjóralæknan áðrenn eina freist uppá 3 dagar frá tí, at áleggið verður givið. Í førum, har váttanin frá djóralæknanum sigur, at grundarlag ikki er fyri áleggi, kann løgreglan leggja málið fyri landsdjóralæknan. Sigur váttanin frá landsdjóralæknanum, at grundarlag er fyri, at áður givin álegg standa við, ella at álegg nú verða givin, fær eigarin ella tann, sum hevur dýrið í hondum, frásøgn um hetta við tilskilan um, at hann við at venda sær til løgregluna áðrenn 14 dagar

ler afkræftet, at dets tilstand er uforsvarlig, kan politiet under en daglig bøde pålægge ejeren eller den, hvem omsorgen for dyret påhviler, at træffe foranstaltning til, at dyret fodres på en forsvarlig måde. Endvidere kan politiet, hvis et dyrs ernæringstilstand eller helbredstilstand gør det påkrævet, ligeledes under pålæg af daglige bøder, forbyde brugen af det for et tidsrum af indtil 2 måneder, hvilken frist kan forlænges, dog kun for 2 måneder, ad gangen. De nævnte pålæg, der kun kan udfærdiges efter indhentet erklæring fra en dyrlæge, skal foreligge skriftligt og indholde oplysning om den i stk. 2 nævnte frist for sagens indbringelse for landsdyrlægen.

*Stk. 2.* Den, over for hvem der i medfør af stk. 1 meddeles pålæg, kan begære spørgsmålet, om der er grundlag for pålægget, indbragt for landsdyrlægen inden for en frist af 3 dage fra pålæggets meddelelse. I tilfælde, hvor dyrlægens erklæring går ud på, at der ikke er grundlag for noget pålæg, kan politiet indbringe sagen for landsdyrlægen. Såfremt landsdyrlægens erklæring giver grundlag for, at de tidligere meddelte pålæg opretholdes, eller at der nu meddeles pålæg, underrettes ejeren eller den, som omsorgen for dyret påhviler, herom med tilkendegivelse

eftir, áleggið er givið, kann krevja málið lagt fyri rættin.

*3. stk.* Kemur krav rættstundis til løgregluna um avgerð í rættinum, skal løgreglan syrgja fyri, at áleggið verður roynt í rættinum antin undir tí móti viðkomandi møguliga reista máli fyri brot á hesa lóg ella undir einum fyri viðkomandi undirrætt serliga reist mál. Verður spurningurin um rættargylduna av givna álegginum lagdur fyri dómstólarnar, hevur hetta ikki við sær, at áleggið verður útsett.

*4. stk.* Avgerðin hjá rættinum um áleggið verður tikin við úrskurði, sum ikki kann skjótast fyri hægri rætt.

*5. stk.* Geva váttanirnar frá djóralæknanum ella landsdjóralæknanum grundarlag fyri, at áleggið verður givið, hevur eigarin ella tann, sum hevur dýrið í hondum, skyldu at bera útreiðslurnar av váttanini. Fyri váttanina frá landsdjoralæknanum er hetta bert galdandi, um eigarin ella tann, sum hevur dýrið í hondum,hevur kravt, at málið verð lagt fyri landsdjóralæknan, og tá skulu bert beinleiðis útreiðslurnar til flutning v.m. gjaldast aftur.

af, at han ved henvendelse til politiet inden 14 dage fra pålæggets modtagelse kan begære sagen indbragt for retten.

*Stk. 3.* Fremkommer rettidig begæring til politiet om retslig afgørelse, påhviler det politiet at foranledige pålægget prøvet af retten enten under den mod pågældende eventuelt rejste sag for overtrædelse af denne lov eller under en for vedkommende underret rejst særlig sag. Indbringelse for domstolene af spørgsmålet om retsgyldigheden af det meddelte pålæg medfører ikke udsættelse af dette.

*Stk. 4.* Rettens afgørelse vedrørende pålægget træffes ved kendelse, der ikke kan indbringes for højere ret.

*Stk. 5.* Såfremt dyrlægens eller landsdyrlægens erklæring giver grundlag for meddelelse af pålæg, er dyrets ejer eller den, som omsorgen for dyret påhviler, pligtig at afholde de med erklæringen forbundne udgifter. Forsåvidt angår landsdyrlægens erklæring gælder dette dog kun, dersom sagen af ejeren eller den, som omsorgen for dyret påhviler, er begæret indbragt for landsdyrlægen, og kun de positive udgifter til befordring m.v. vil være at erstatte.

**§ 15.** Í føri har undirfóðring av einum dýri, hóast álegg eftir § 14, 1. stk., áhaldandi fer fram

**§ 15.** I tilfælde, hvor der til trods for pålæg i medfør af § 14, stk. 1, fortsat finder underernæring

ella, har mishandling av einum dýri fyriliggur, kann løgreglan flyta dýrið burtur og antin seta tað aðra staðni ella, um støðan hjá tí er sovorðin, at tað eftir umbidnari váttan frá landsdjóralæknanum ikki eigur at liva, lata tað avlíva. Útreiðslurnar av hesum ber eigarin ella tann, sum hevur dýrið í hondum.

**§ 16.** Tað er skylda hjá hvørjum djóralækna, sum kemur til eitt skatt ella sjúkt dýr, ið hann metir, ikki kann lekjast, og at tað fer at hava óneyðuga líðing við sær at lata tað liva, beinan vegin at fáa tað dripið, um eigarin ella tann, sum hevur dýrið í hondum, samtykkir í hesum, og um dýrið er tryggjað, at játtan frá tryggingarfelagnum er fingin. Eru hesar treytir ikki uppfyltar, er tað skylda hjá djóralæknanum beinan vegin at greiða løgregluni frá viðurskiftunum.

*2. stk.* Tá ið løgreglan fær slíka frágreiðing, skal hon alt fyri eitt biðja um váttan frá landsdjóralæknanum.

*3. stk.* Fær løgreglan á annan hátt kunnleika til, at eitt skatt ella sjúkt dýr er í slíkari støðu, at fortreytirnar fyri, at tað skal avlívast sambært 1. stk. kunnu ætlast at vera til staðar, skal váttan somuleiðis fáast frá djóralækna. Sigur váttanin frá djóralæknanum, at dýrið eigur

sted af et dyr, eller hvor mishandling af et dyr foreligger, kan politiet fjerne dyret og enten anbringe det andetsteds eller, såfremt dets tilstand er sådan, at det efter indhentet erklæring fra landsdyrlægen ikke bør leve, lade det aflive. Udgifterne, der er forbundet dermed, påhviler ejeren eller den, som omsorgen for dyret påhviler.

**§ 16.** Det påhviler enhver dyrlæge, som tilser et tilskadekommet eller sygt dyr, om hvilket han mener, at det ikke kan helbredes, og at det vil medføre unødig lidelse at lade det leve, straks at foranledige det dræbt, såfremt ejeren eller den, som omsorgen for dyret påhviler, erklærer sig enig heri, og hvis dyret er forsikret, forsikringsselskabets samtykke foreligger. Er disse betingelser ikke opfyldt, påhviler det dyrlægen omgående at indberette forholdet til politiet.

*Stk. 2.* Når politiet modtager sådan indberetning, indhentes der straks erklæring fra landsdyrlægen.

*Stk. 3.* Kommer politiet ad anden vej til kundskab om, at et tilskadekommet eller sygt dyr befinder sig i en sådan tilstand, at betingelserne for dets aflivning i medfør af stk. 1 må antages at foreligge, indhentes der ligeledes erklæring fra en dyrlæge. Går dyrlægens erklæring ud

at verða avlívað, skal tað avlívast alt fyri eitt, um eigarin ella tann, sum hevur dýrið í hondum, váttar, at hann er samdur við hetta og, um dýrið er tryggjað, játtan frá tryggingarfelagnum er fingin. Eru hesar treytir ikki loknar, skal løgreglan alt fyri eitt biðja um váttan frá landsdjóralæknanum.

*4. stk.* Um váttanin frá landsdjóralæknanum eftir 2. og 3. stk. sigur, at dýrið eigur at verða avlívað, skal hetta gerast alt fyri eitt.

*5. stk.* Í øllum førum, har avlíving skal finna stað, skal eigarin ella tann, sum hevur dýrið í hondum, hava skrivlig boð um hetta. Verða boðini ikki fylgd alt fyri eitt, skal løgreglan syrgja fyri, at dýrið verður avlívað.

*6. stk.* Tá ið tað hevur við sær óneyðugar, álvarsamar líðingar fyri eitt dýr, at tann í oman fyri nevndu reglum fyriskrivaða mannagongd verður brúkt, kann avliving av einum skaddum dýri tó altíð verða gjørd alt fyri eitt, um tað er eyðsýnt, at dýrið ikki fer at koma undan meininum ella sum fylgja av hesum eftir fyriskrivaðu mannagongdini kortini verður avlívað.

*7. stk.* Eigarin ella tann, sum hevur dýrið í hondum, ber útreiðslurnar av avlívingini av dýrinum. Útreiðslurnar fyri at fáa ta í 3. stk. nevndu djóralæknaváttan ber tað almenna, um av-

på, at dyret bør aflives, sker aflivningen straks, såfremt ejeren eller den, som omsorgen for dyret påhviler, erklærer sig enig heri, og hvis dyret er forsikret, forsikringsselskabets samtykke foreligger. Er disse betingelser ikke opfyldt, indhenter politiet straks erklæring fra landsdyrlægen.

*Stk. 4.* Dersom den fra landsdyrlægen i medfør af stk. 2 eller stk. 3 indhentede erklæring går ud på, at dyret bør aflives, skal aflivning straks finde sted.

*Stk. 5.* I alle tilfælde, hvor aflivning skal finde sted, meddeles der ejeren eller den, som omsorgen for dyret påhviler, skriftligt pålæg herom. Såfremt pålægget ikke straks efterkommes, sker aflivningen ved politiets foranstaltning.

*Stk. 6.* Når det ville medføre unødige, alvorlige lidelser for et dyr, at den i de foranstående bestemmelser foreskrevne fremgangsmåde anvendes, kan aflivning af et tilskadekommet dyr dog altid finde sted straks, såfremt det er åbenbart, at dyret ikke vil overleve skaderne eller som følge af disse efter den foreskrevne fremgangsmåde alligevel ville blive aflivet.

*Stk. 7.* Udgiften ved aflivning påhviler dyrets ejer eller den, som omsorgen for dyret påhviler. Udgiften ved tilvejebringelsen af den i stk. 3 nævnte dyrlæ-

gerðin er, at dýrið ikki skal avlívast, er tað mótsatt, ber eigarin ella tann, sum hevur dýrið í hondum, tær. Um váttanin frá landsdjóralæknanum eftir 2. og 3. stk. sigur, at avlíving eigur at fara fram, hevur eigarin ella tann, sum hevur dýrið í hondum — ella tryggingarfelagið, um málið cinans er lagt fyri landsdjóralæknan vegna tørvandi samtykki frá hesum — skyldu at endurrinda beinleiðis útreiðslurnar til flutning v.m. Annars ber tað almenna útreiðslurnar til landsdjóralæknan. Allar útreiðslur kunnu vera bornar av løgregluni sum forskot.

geerklæring påhviler det offentlige, såfremt afgørelsen går ud på, at aflivning ikke skal finde sted, medens den i modsat fald påhviler dyrets ejer eller den, som omsorgen for dyret påhviler. Såfremt den af landsdyrlægen i medfør af stk. 2 og stk. 3 afgivne erklæring går ud på, at aflivning bør finde sted, er ejeren eller den, som omsorgen for dyret påhviler — eller forsikringsselskabet, hvis sagen alene er forelagt landsdyrlægen på grund af manglende samtykke fra dette — pligtig at erstatte de positive udgifter til befordring m.v.; iøvrigt afholdes udgifterne til landsdyrlægen af det offentlige. Samtlige udgifter kan forskudsvis afholdes af politiet.

## 4. kapittul
## Almennar reglur og revsireglur v.m.

**§ 17.** Landsstýrið kann áseta reglur ella taka avgerð um flutning, slátur, avlíving, marking og serliga viðferð annars av dýrum.

## Kapitel 4.
## Almindelige bestemmelser og straffebestemmelser m.v.

**§ 17.** Landsstyret kan fastsætte bestemmelser eller træffe afgørelse om dyrs transport, slagtning, aflivning, mærkning og deres behandling i anden særlig retning.

**§ 18.** Vinnuligur handil við dýrum frá handli ella øðrum føstum sølustað kann bert fara fram við lovvi frá løgregluni. Lovvið

**§ 18.** Erhvervsmæssig handel med dyr fra butik eller andet fast forretningssted må kun ske med politiets tilladelse. Tilladelsen

kann verða tikið aftur, um tann handlandi verður revsaður fyri brot á hesa lóg ella, um dýrini ikki vera hildin og røkt forsvarliga.

*2. stk.* Reglan í 1. stk. er ikki galdandi fyri handil við rossum, neytum, svínum, seyði, geitum, kaninum, loðdýrum, flogfenaði og fiski.

**§ 19.** Tann, sum við overving, vanrøkt ella á annan hátt fer óforsvarliga við dýrum, verður revsaður fyri dýrplágarí við bót, hefti ella fongsli í upp til 1 ár. Hava viðurskiftini borið eyðkenni av mishandling, er revsingin fongsul í upp til 1 ár, við uppafturtøku í 2 ár.

*2. stk.* Tann, sum annars ger brot á reglurnar í hesi lóg ella á reglur ásettar eftir hesi lóg, verður revsaður, uttan so at annað er ásett, við bót ella hefti. Á sama hátt verður tann revsaður, sum skúgvar treytirnar fyri einum loyvi eftir lógini til viks ella letur vera við at fylgja forboðum ella boðum, sum eru givin eftir lógini ella eftir reglum eftir lógini.

*3. stk.* Skúgvar ein djóralækni fráboðanarskyldu sína eftir § 16, 1. stk. til viks, verður hann revsaður við bót.

*4. stk.* Er eitt brot gjørt av einum partafelagi, lutafelagi ella líknandi, kann bótarskyldan verða áløgd felagnum sum slíkum.

kan til enhver tid tilbagekaldes, såfremt den handlende straffes for overtrædelse af denne lov, eller såfremt dyrene ikke passes og plejes forsvarligt.

*Stk. 2.* Bestemmelsen i stk. 1 finder ikke anvendelse på handel med heste, kvæg, svin, får, geder, kaniner, pelsdyr, fjerkræ og fisk.

**§ 19.** Den, som ved overanstrengelse, vanrøgt eller på anden måde behandler dyr uforsvarligt, straffes for dyrplageri med bøde, hæfte eller med fængsel indtil 1 år. Har forholdet haft karakter af mishandling, er straffen fængsel indtil 1 år, i gentagelsestilfælde 2 år.

*Stk. 2.* Den, som iøvrigt overtræder de i denne lov indeholdte eller i medfør af loven udstedte forskrifter, straffes, forsåvidt ikke andet er bestemt, med bøde eller hæfte. På samme måde straffes den, som tilsidesætter vilkår for en tilladelse i henhold til loven eller i henhold til forskrifter udstedt i medfør af loven eller undlader at efterkomme forbud eller påbud, der er meddelt i henhold til loven eller i henhold til forskrifter udstedt i medfør af loven.

*Stk. 3.* Tilsidesætter en dyrlæge sin anmeldelsespligt efter § 16, stk. 1, straffes han med bøde.

*Stk. 4.* Er en overtrædelse be-

gået af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan bødeansvar pålægges selskabet som sådant.

**§ 20.** Tann, sum er dømdur sekur fyri mishandling av dýrum, eins og tann, sum fyri áður at hava gjørt seg sekan í dýrplágarfi ella í øðrum broti av reglunum í hesi lóg ella í § 196 í borgarligu revsilógini av nýggjum verður sekur í slíkum broti, kann við dóminum fyri allar tíðir ella fyri eitt nærri avmarkað tíðarskeið verða frásagdur rættin til at eiga, brúka, halda ella slakta ella sum heild láast við dýr persónliga. Forboðið kann avmarkast til at viðvikja ávísum sløgum av dýrum. Brot á forboðið verður revsað við bót. Løgreglan kann flyta dýrið og selja tað ella avlíva tað, um ikki eigarin áðrenn eina freist, ið løgreglan ásetir, syrgir fyri, at dýrið verður sett aðrastaðni. Útreiðslurnar, ið standast av hesum, verða bornar av tí, ið brotið hevur forboðið.

*2. stk.* Tann, sum við vitan um eitt slíkt forboð, letur ein persón, hvørs rættur til at fáast við dýr heilt ella partvís er frádømdur eftir 1. stk., í tænastu síni útinna eitt verk, ið er móti forboðnum, verður revsaður við bót.

**§ 20.** Den, der ved dom findes skyldig i mishandling af dyr, såvel som den, der efter tidligere at have gjort sig skyldig i dyrplageri eller i anden overtrædelse af forskrifterne i denne lov eller i § 196 i borgerlig straffelov pány findes skyldig i sådan overtrædelse, kan ved dommen for bestandig eller for et nærmere fastsat tidsrum frakendes retten til at eje, bruge, passe eller slagte eller i det hele at beskæftige sig personligt med dyr. Forbudet kan begrænses til at angå bestemte arter af dyr. Overtrædelse af forbudet straffes med bøde. Politiet kan fjerne dyret og lade det sælge eller aflive, medmindre ejeren inden en af politiet fastsat frist drager omsorg for dyrets anbringelse andetsteds. Udgifterne ved de af politiet trufne foranstaltninger påhviler den, der har overtrådt forbudet.

*Stk. 2.* Den, der med viden om et sådant forbud lader en person, hvem retten til at beskæftige sig med dyr helt eller delvis er frakendt i medfør af stk. 1, i sin tjeneste udøve en virksomhed, der strider mod forbudet, straffes med bøde.

**§ 21.** Tað áliggur foreldrum,

**§ 21.** Det påhviler forældre, væ-

verja, húsbónda og øðrum, sum hava umsjón við børnum undir 15 ár, at syrgja fyri, at hesi ikki gera seg sek í broti á hesa lóg. Verður slíkt lógarbrot gjørt av barni undir 15 ár, verður tann revsaður, ið umsjónina hevur, um hann er vitandi um brotið, uttan at hann hevur roynt at fyribyrgja tí.

*2. stk.* Er groft ósketni frá tí, ið umsjónina hevur, orsøk til, at hann er óvitandi um brotið, sum barnið hevur gjørt, verður hann revsaður við bót ella hefti.

**§ 22.** Sakarmál um brot á hesa lóg verða viðgjørd sum løgreglumál.

*2. stk.* Útreiðslurnar eftir hesi lóg verða, uttan so at annað er ásett, bornar av tí almenna sum útreiðslur hjá løgregluni.

**§ 23.** Lógin kemur í gildi, tá hon verður kunngjørd. § 3, 6. pkt., kemur tó í gildi 1. oktober 1989.

*2. stk.* Samstundis fer lóg nr. 152 frá 17. mai 1916 »om værn for dyr« samb. »anordning« nr. 110 frá 19. mars 1919, og § 196 í borgarligu straffilógini, samb. »lovbekendtgørelse« nr. 215 frá 24. juni 1939, úr gildi.

ge, husbond og andre, der har tilsyn med børn under 15 år, at drage omsorg for, at disse ikke gør sig skyldige i overtrædelse af et barn under 15 år, straffes den tilsynsførende for overtrædelsen, såfremt den er begået med hans vidende, uden at han har forsøgt at forhindre det.

*Stk. 2.* Skyldes det grov uagtsomhed fra den tilsynsførendes side, at han har været uvidende om den af barnet begåede overtrædelse, straffes han med bøde eller hæfte.

**§ 22.** Sager om overtrædelse af denne lov behandles som politisager.

*Stk. 2.* Udgifter i henhold til denne lov afholdes, forsåvidt ikke andet er bestemt, af det offentlige som udgifter vedrørende politivæsenet.

**§ 23.** Loven træder i kraft ved dens kundgørelse. § 3, pkt. 6, træder dog i kraft 1. oktober 1989.

*Stk. 2.* Samtidig ophæves lov nr. 152 af 17. maj 1916 om værn for dyr, jfr. anordning nr. 110 af 1. marts 1919, samt § 196 i borgerlig straffelov, jfr. lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939.

## 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Arbeiðsbólkurin og setningur hansara

Í skrivi dagfest 3. juni 1980 — F.L. j.nr. 1713-13-3 — boðar landstýrið frá, at valdur er ein arbeiðsbólkur við fylgjandi limum:

1. Djóraverndarfelagið, v/ Noomi Juul, form.,
2. Landsdjóralæknin,
3. Jalgrím Hilduberg, fulltrúi,

at kanna djóraverndarlógina og møguliga koma við uppskoti til broytingar ella nýggja lóggávu.

Bólkurin hevði ein orienterandi fund tann 16. juni 1980, har ið Lisbeth Petersen møtti fyri Djóraverndarfelagið, og næsta fund tann 29. september 1981. Á triðja fundi tann 14. januar 1982 varð framlagt eitt uppskot til nýggja djóraverndarlóg, sum landsdjóralæknin ikki kundi taka undir við, tí uppskotið var ov illa umhugsað og undirbygt.

Í staðin mælti landsdjóralæknin landsstýrinum til at skipa eina nevnd av sak- og lógkønum embætismonnum at gera uppskot til eina lóg um vernd av dýrum.

Í skrivi dagfest 22. februar 1982 — F.L. j.nr. 1713-13-3 — verður sagt frá, at landsstýrið hevur samtykt at velja ein arbeiðsbólk við fylgjandi limum:

D. J. Bærentsen, landsdjóralækni,

Justinus Olsen, djóralækni,

M. Nepper-Christensen, landfúti, og

Hanus Wardum, landbúnaðarráðgevari,

at kanna djóraverndarlóggávuna og koma við uppskoti til broytingar ella til nýggja lóggávu. Til skrivara hjá bólkinum hevði landsstýrið útnevnt Jalgrím Hildubeig, fulltrúa á landsskrivstovuni, seinni varð Sjúrður Rasmussen, fultrúi á landsskrivstovuni, skrivari hjá bólkinum.

Arbeiðsbólkurin hevur kunnað seg um danska, norska og íslendska lóggávu um vernd av dýrum og somuleiðis tann europeiska millumlanda sáttmálan (konventión) um vernd av dýrum, ið verða hildin í landbúnaðarendamálum.

Djóravernd er eftir heimastýrislógini føroyskt sermál, meðan rættarskipanin er donsk.

Arbeiðsbólkurin hevur valt ta donsku lógina — Lóg nr. 256 frá 27. mai 1950 »om værn for dyr« við seinni broytingum —sum fyridømi í høvuðsheitum, men tillagað serligum føroyskum viðurskiftum.

Bólkurin hevur hildið 8 fundir.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi reglur um vernd av dýrum eru at finna í lóg nr. 152 frá 17. mai 1916, samanber kongiliga fyriskipan nr. 110 frá 1. mars 1919, (§ 1 strikað við lóg nr. 127 frá 15. apríl 1930).

Fyriskipanin er hjáløgd sum skjal 1.

Eisini er galdandi § 196 í revsilógini, samanber lógarkunngerð nr. 215 frá 24. juni 1939.

Ástanin er hjáløgd sum skjal 2.

Eisini eru at finna í lóg nr. 43 frá 13. mars 1891, samanber kunngerð nr. 93 frá 27. apríl 1929, ásetanir um kykskurð av dýrum.

## 2. Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar

*Til kapittul 1.*
*Viðferð av dýrum*

*Til § 1.*

Lógin fevnir sum høvuðsregla um øll dýr, fuglar og fiskar. Í fyrsta lagi ei hugsað um tom dýr, sum fólk halda sum vinnu, húsdýr, ella sum kelidýr, ið eru meira og minni bundin av røkt.

Í øðrum lagi er hugsað um vill dýr í natúruni, sum fólk gera seg inn á á ymsan hátt, eitt nú veiðu.

Øll dýr eiga eftir lógini at fáa forsvarliga røkt og viðferð og skulu ikki koma fyri óneyðugari líðing so langt, sum rímiligt er.

Viðmerkjast skal, at bólkurin roknar ikki lógina at galda fyri dýr á lágum stigi, sniglar, maðkar, skordýr o.l.

Eftir løgtingslóg nr. 40 frá 1. juni 1961 um oyðing av rottu hava

kommunurnar skyldu at leggja eitur út fyri rottur. Sjálvt um rottur óivað líða av hesum — tað velst um eiturslag, eitt nú tallium og fosforolju, meðan dikumarol og tilbúningar av tí ikki roknast at hava líðing við sær — so metir bólkurin, at almannagagnið av hesum tiltaki telur meira enn fyrilitið fyri skaðadýrum í hesum føri.

**Til § 2.**

Greinin fyriskrivar almennar reglur fyri øll, sum hava ábyrgd av dýrum, eigara, tann, sum hevur í hondum, ella røktar fyri annan. Dýrið skal fáa nóg mikið av hóskandi fóðri og drekka.

Fyri kelidýr, serliga hundar, er heldur tað vanligt, at hesi dýr fáa ov mikið at eta og lítlar og ongar møguleikar at røra seg og tí vantrívast av fiti. Viðvíkjandi forsvarligari røkt og haldi verður tað at laga seg eftir hvørjum dýraslagi sær soleiðis at skilja, at hetta lagar seg eftir íbornari og natúrligari trongd hjá dýrinum so langt, sum ráð eru fyri. Syrgjast skal fyri, at dýrið fær nóg mikið og gott fóður og vatn eftir tørvi hjá viðkomandi dýraslagi. Serligt umhugsni skal sýnast bundnum ella avbyrgdum dýrum og upp í hetta, metir bólkurin, skal eisini teljast alifiskar í kørum og nótum, at hann verður fóðraður eftir natúrligum tørvi og ikki gongur ov tætt innibyrgdur. Upp í forsvarliga røkt og hald skal roknast, at dýrini verða hildin sømiliga rein og frí fyri snultudýr. Kløvur, kleyvar og hógvar skulu røkjast. Helsi og girðingar skulu vera so háttað, at tey ikki skaða dýrini, so tey líða óneyðugt. Sjúk ella skadd dýr skulu viðgerast hóvliga ella avlívast, um tað gerst neyðugt.

Hvør, sum hevur dýr, skal syrgja fyri, at tilhaldsrúmið hjá dýrinum er forsvarligt innrættað. Hetta verður at skilja soleiðis, at tann, ið eigur, hevur í hondum ella røktar húsdýr, kelidýr ella onnur dýr og fiskar í fangaskapi ella á annan hátt hevur ábyrgd av dýrinum, skal syrgja fyri, at tilhaldsrúmið er hóskandi fjálgt, ljóst, friskligt og annað alt eftir, sum tað er høviligt eftir natúrligari trongd hjá hvørjum dýraslagi sær, so langt sum gjørligt. Leys húsdýr, eitt nú ross, neyt og seyður skulu í byrgjum og á traðum hava høvi at søkja sær skýli, og somuleiðis skulu hús ella ból vera í haganum, har ið seyður annars ikki kann finna sær natúrligt skýli. Viðvíkjandi verpingarbúrum ásetir landsstýrið nærri reglur ella tekur avgerð um treytir sambært § 5, 2. og 3. stk.

Viðvíkjandi fóðring av vanligum húsdýrum til framleiðslu, neyt, seyð, svín, flogfenað (høsn, dunnur, gæs o.a.), ross og loðdýr skal bólkurin gera nakrar viðmerkingar.

Neyt hava í mongum førum til okkara dagar verið lungursfóðrað, sum ikki svarar til sømiliga viðferð av bundnum ella innibyrgdum dýri, sum ikki hevur møguleika sjálvt at finna sær mettu í natúruni. Hetta háttalag er við at doyggja burtur um ikki av øðrum grundum so tí, at tað loysir seg ikki nú á døgum. Heldur er tað eitt vandamál hjá neytaeigarunum at duga á at skyna hóskandi mongd og samanseting av fóðri svarandi til ta stóru framleiðsluna, sum er neyðug av fíggjarligum grundum. Meðan tað áður bar til at fóðra kúnna við hoyggi og kanska onkrum tilskoti afturat, so krevst í dag neyvur kunnleiki til tørvin á røttu samansetingini av teim ymsu fóður- og mineralevnunum og vitaminum, sum skulu til. Skeiv samanseting er vanlig orsøk í dag til, at kýr leggjast í básin ella fáa kramparið.

Viðvíkjandi nóg mikið av fóðuri hevur bólkurin eisini í huga neyt á biti — at reka út og inn ella at liggja úti — at nóg mikið og gott er at bíta, og um ikki so er, at tey fáa fóður afturat.

Um seyð er at siga, at hann hevur í øldir gingið úti alt árið og í flestu førum komið undan á tann hátt, at hann hevur drigið hold á seg um summarið og út á heystið, sum hann síðani um veturin og út á várið hevur havt at tært av. Treytin fyri, at hetta hevur borið til er, at seyðurin hevur verið røktaður við skili, og at hagarnir ikki hava havt størri skipan, enn at seyðurin fekst undan við tí, sum gróði á jørðini. Tá ið veðurlagið sveik, komu óár og felli.

Bólkurin metir ikki, at tað er óforsvarligt, um seyður ikki er so feitur á vári sum á heysti, men tað kann ikki góðtakast, at seyður doyr í raki ella svøltar, tí hagar, partar av høgum ella traðir eru yvirskipaðar. Tá ið veðurlagið gerst so háttað, at útigonguseyður svøltar, skal hann fóðrast, har sum atkomandi er. Har ið ikki er atkomandi, eigur skipanin at vera hareftir og støður til seyðin.

Tað sama er at siga um útigonguross, um tey ikki verða tikin inn á vetri.

**Til § 3.**

Greinin fyrisetir forboð fyri ymsum mátum at viðfara dýr. Bólkurin hevur í høvuðsheitum brúkt tað danska mynstrið, men skotið eitt 6. og 10. pkt. inn, sum neyðugt her á landi.

*Að. 1.* Helsi, grímur og tjóður skulu vera so háttað, at tey ikki pína dýrið ella forða dýrinum at fáa hvíld. Av ósketni ella líkasælu kemur tað fyri — og ikki so sjáldan — at helsi og grímur gnaga seg inn í hold-

ið av tí, at dýrið veksur, ella at helsið ella gríman er av tilfari, sum tódnar (tog) ella rubbar (nylon). Tað sama kann henda við at kleppa og fatla dýr, um tað ikki verður hugt javnan til tað og ansað eftir. Summar nýmótans greiðir at binda neyt við eru sovorðnar, at ivi kann vera, um tær ikki tarna neytinum óneyðugt. Tjóður skal vera so hátt-að, at tað ikki sansar at, og nóg langt til, at dýrið hevur rímiligt rása-rúm. Bólkurin veit at siga frá, at klagað hevur verið um, at hundur hevur staðið bundin við ov stuttum boði, men heldur kortini ikki, at tað ber til at seta neyvt mark fyri hesum, sum verður at taka støðu til í hvørjum føri eftir umstøðunum.

*Ad. 2.* Forboðið er at sláa dýr við lingum, sum kunnu valda dýrinum skaða ella nógva pínu, og tað sjálvt um dýrið ikki verður skatt. Hin vegin er ikki forboðið at sláa dýrið við slíkum, sum ikki kann skaða, men hava sviða við sær fyri at aga áleypandi, ólýðin ella treisk dýr. Bólkurin er kunnugur við, at Føroya Ríðingarfelag hevur forboðið limum sínum at brúka písk til kapprenningar nú í fleiri ár.

*Ad. 3.* At svíða ullina av neytum var vanligt fyrr, men verður valla gjørt longur. Hinvegin heldur bólkurin, at tað er eingin grund fyri at strika hetta forboð.

*Ad. 4.* At seta seym, stáltráð ella annað í rennilin á sníni er helst ókent í Føroyum, men verður tað strikað, kann tað møguliga týðast soleiðis, at tað er loyvt, og tí mælir bólkurin til, at tað verður standandi.

*Ad. 5.* Hetta sipar einamest til burðshjálp hjá kúgv, tá ið kálvurin er ov stórur, og tað kann verða neyðugt at hjálpa til og hála. At ein maður ella tveir hava í eitt band um føturnar á kálvinum er eitt, sum ikki nervar kúgv ella kálv stórvegis, men at seta talju ella aðra kraft á, sum maður missir følingina av, hvussu stór dráttarmegin er, er forboðið.

*Ad. 6.* Hetta er nýtt uppskot, sum bólkurin heldur verða serliga neyð-ugt at taka við í eini føroyskari lóg um vernd av dýrum.

Horn á veðrum, sum eru nakkhyrntir og ringhyrntir, hava lyndi at ganga í kjálkarnar, tá ið hornini vaksa. Ódn kemur í kjálkarnar, og at enda fær seyðurin ikki etið. Fyri at fyribyrgja hesum hava menn sett klemmu á hornini, vanliga við at bora hol ytst í hornini og so seta teinajarn í holini at spenna hornini frá ella eisini at bora hol í rønna nakað frá hornsrótini og seta jarntráð í her, sum kúgar hornini saman

sum tey vaksa, so at stiklini á tann hátt ganga frá kjálkunum í fyrstu syftu. Hesin háttur ber í sær, at hornini seinni vaksa í nakkan á seyðinum. Annar brúktur máti er at saga nakrar foyrur í hornini inn móti slóðini uttan og ovarlaga á hornunum, soleiðis at gyrðið í hornunum verður minni uttan enn innan, og at hornini á tann hátt ganga frá kjálkunum.

Tann ódámligasti mátin er at verma hornini upp við blásilampu, so tey blotna so nógv, at tey kunnu bendast frá við hondunum, ella beinleiðis at saga hornini av uttan doyving.

Bólkurin heldur hetta vera høpisleysa og sera óforsvarliga viðferð, ja beinleiðis mishandling av dýrinum, sum er óneyðug, tí tað kann lættliga fyribyrgjast við umhugsni, tá ið veðragjólingur verður uppgjørdur.

Av eini ella aðrari óskiljandi grund uttan nakrari vitskapligari undirbygging hava mangir menn ta uppfatan, at ring- og nakkhyrntur seyður roynist betur enn víð- og gleivhyrntur seyður. Úrslitið er í støðum blivið tað, at hornini á veðurlombum ganga í longu í várgongu, sum hevur fingið ta fylgju, at menn noyðast at saga av hornunum ella, sum tað frættist, at snara hornini av slóini.

Hetta óskil kann rættast við annaðhvørt at ala undan kollutum veðurlombum ella bert at gera veðragjólingar upp, sum eru víð- og gleivhyrntir í staðin fyri at gera brund upp, sum ber í sær deyðan ella óneyðuga píning fyri seg sjálvan og tað, sum kemur undan slíkum seyði.

Tað er bólkinum greitt, at hetta gerst ikki eftir einum ári. Skotið verður tí upp, at § 3, 6. pkt. ikki kemur í gildi fyrr enn 5 ár eftir, at lógin er lýst.

Í hesum sambandi verður víst til:
1) at ikki er loyvt at saga horn uttan nýtslu av doyving, samanber § 11, 1. pkt.,
2) at tað er brot á § 1 at verma horn, so tey kunnu bendast frá. Hetta verður revsað eftir § 19.

*Ad. 7.* Bólkurin kennir einki til, at dýr hava verið gødd við at kúga fóður í tey sum aðrastaðni, eitt nú gæs og kálvar. Hetta eigur sjálvsagt at vera forboðið, uttan tó at forða fyri, at dýr verður tvingsilsfóðrað av heilsuligum grundum.

*Ad. 8 og 9.* Ongar viðmerkingar.

*Ad. 10.* Sí viðmerkingar til § 8.

**Til § 4.**
*Ad. 1.* Hendan reglan er tikin við úr gamlari danskari lóg yvir í nýggja lóg og er eisini galdandi í Noregi. Bólkurin kennir einki til hendan vana í Føroyum, men mælir tó til, at hetta verður galdandi.

*Ad. 2.* Í samband við fiskaaling verður livandi fiskur javnan vigaður, men tað kann valla hugsast, at slíkur virðismikil fiskur verður krøktur.

*Ad. 3.* Aðrastaðni hava lystfiskarar egnt við livandi dýrum, eitt nú froskum. Bólkurin veit einki um, at tað hevur verið siður her á landi at egna við livandi geisladýrum ella livandi fiski. Tað hevði tí ikki komið illa fyri hjá nøkrum, um tað eisini varð forboðið at egna við livandi fiski.

**Til § 5.**

Í lógini frá 1950 var tað í § 3, 6. pkt., forboðið at brúka verpingarbúr, t.v.s. at seta hønu, ið verpur, í búr.

Síðani tá eru stórar broytingar hendar í høsnahaldinum, sum frá at vera eitt húsdýrahald við fáum til nøkur hundrað høsn til nú ein stórídnað við nógvum túsund høsnum í búrum, har ið fóðring, brynning, sóping, lufting, verming, ljós og eggjasavning er sjálvvirkandi. Á henda hátt gerst eggjaframleiðslan bíligari, enn tá ið høsnini gingu leys ella í búrum á gólvi ella neti.

Fyri danskt høsnahald varð fylgjan av forboðnum fyri verpingarbúr, at tað ikki var kappingarført við onnur lond á eggjamarknaðinum, og fleiri fóru tí at gera eggjaverksmiðjur, sum var brot á galdandi lóg.

Mikil orðadráttur hevur verið um hetta í fleiri ár. Vinnan hevur strongt á, at skal hon vera kappingarfør á marknaðinum, má hon eisini sleppa at framleiða undir somu treytum sum aðrir eggjaframleiðarar. Sum prógvgrundir verður víst á, at búrhønur verpa fleiri egg, verða ikki so lætt smittaðar av sjúkum og snúltarum sum hønur, ið liva í flokki á jørðini ella pikka hvørja aðra til deyðis (kanibalismu).

Mótstøðumenn hava borið fram, at tað er ósømilig viðferð at seta eina hønu í búr, sum forðar henni á allari náttúrligari atferð eitt nú at flaksa við veingjunum, at skava ella at rulla sær (baða) í mold ella eyri, sum høsn eru von. Hønur í búri gerast beinveikari og hava lyndi at bróta bein og veingir.

Aftaná drúgvt orðaskifti í øllum fjølmiðlum og í fólkatinginum kom broyting í við lóg nr. 203 frá 23. mai 1979, har forboð fyri

verpingarbúrum fór úr gildi og í staðin komu lógarreglurnar sum í § 5 í hesum uppskoti.

Nærri reglur eru fyriskrivaðar í »bekendtgørelse« nr. 340 frá 30. juni 1981, sum eru tillagaðar EF-reglum.

Noreg, sum ikki er í EF, hevur strangari reglur, tó krevja størri rúm til hvørja hønu og loyva bert 3 hønum í hvørjum búri v.m.

Eftir uppskotinum fyriskrivar landsstýrið gjøllari reglur ella avger treytirnar fyri loyvi, og hvussu dýrini skulu haldast og røktast (2. stk.), somuleiðis gjøllari reglur ella avgerð um innrætting, rakstur og brúk av øðrum framleiðsluháttum av egguum enn teim í 1. og 2. stk. nevnudu. Landsdjóralæknin umsitur og hevur umsjón við hesum viðurskiftum.

**Til § 6.** Ongar viðmerkingar.

**Til § 7.**

Tað kemur valla at verða stórvegis brúk fyri hesi grein.

Framsýning fyri almenninginum av tamdum dýrum sum vinna, eitt nú í sirkus, man vera ókent í Føroyum, og hetta kann illa hugsast at koma uppá tal, tí, um ikki annað, so av smittuávum sambært lóg nr. 36 frá 28. februar 1908 verður valla nakran tíð givið loyvi til ferðandi sirkus at taka slík dýr hendanvegin.

Eins og sirkussýning er eisini film- og sjónvarpsupptøka forboðin, um temjingin av dýrinum til hetta endamál elvir dýrinum meir ella álvarsliga pínu.

Hetta hevur tó ikki við sær, at forboð eru fyri at sýna film- og sjónvarpsupptøkur av slíkum, sum er upptikið í øðrum londum, tí tað viðkemur ikki føroyskari lóggávu um vernd av dýrum.

Hin vegin er tað ikki forboðið at sýna fram húsdýr, eitt nú at hava neyta- rossa- og seyðasýningar sum eitt lið í aliarbeiði ella sýning av kelidýrum í vakurleikakapping, um tað skuldi komið fyri.

Kappríðing við rossum er at rokna fyri eina almenna framsýning av dýrum.

Bólkurin heldur ikki, at kappríðing ein stuttan tein, so sum tað er vanligt her á landi, kemur undir forboðið eftir hesi grein, tá ið talan er um frísk ross, sum meira ella minni av egnum — íbornum ella tilvandum — kappingarhugi royna seg í dystinum, uttan at dýkt verður á við koyrli ella spora ella at verða ávirkað av doyvandi ella dúsandi heilivági, soleiðis at tey í kappingini fremja meira enn evni eru til (doping).

*2. stk.* Ongin viðmerking.

*3. og 4. stk.*
Eingir dýragarðar eru í landinum, og valla verður nakar heldur, men um tað skuldi hent, krevst loyvi frá landfútanum eins og í Íslandi. Dýralundir eru heldur ikki í landinum uttan so, at hugsað verður um viðalundina í Tórshavn, har ið nakrir svanar hava hildið til saman við nøkrum dunnum. Verða hesir fuglar lívgaðir og annars fáa frið fyri ótangum, skuldi einki verið at funnist at.

**Til kapittul 2.**

*Avlíving og skurðviðgerð v.m.*

**Til § 8.**

Greinin fyriskrivar sum almenna reglu, at dýr skulu avlívast ruddiliga ella so skjótt og pínuleyst sum gjørligt. Størri dýr, sum eru soleiðis skadd, at tey mugu avlívast, kunnu ikki flytast, men skulu avlívast á staðnum. Sum dømi eru nevnd ross og neyt, men bólkurin metir, at svín og seyður eisini koma undir hesa reglu.

Eftir § 17 verður landsstýrinum heimilað at áseta reglur fyri avlíving v.m.

Bólkurin hevur umhugsað grindadráp og hvalaveiðu.

Hvalaveiða hevur í óminniligar tíðir verið lívsneyðug fyritreyt fyri fólkið her á landi til okkara dagar. Av royndum gjøgnum øldir eru reglur fyriskrivaðar um, hvussu menn skulu bera seg at fyri at bjarga sær og sínum henda mat, sum í neyðartíðum átti lívið í mongum. Hvalvágir vóru valdar eftir royndum og løggildar eftir reglum, sum best tryggjaðu, at fongurin skuldi eydnast, og reglur vóru fyri, hvussu grindabátar skuldu vera mannaðir við formanni og útgjørdir við hóskandi tali av váknum, onglum, kasti og línum. Umráðandi var at drepa skjótt, fyri at matur ikki skuldi spillast. Roynt varð við skynsemi at bera so í bandi, at grindin gjørdi landgongd og sjóvarfall, flóð og fjøra var týðandi partur í metingini um bestu líkindi at halda til.

Tá ið landgongdin miseydnaðist, var bert eftir at stinga ella høgga, og tá ið heilt illa gekst, at skutla. Menn hava allar tíðir harmast um miseydnað grindadráp og hugsað um bøtandi broytingar. Stór nót varð gjørd á Vestmanna fyri meira enn 100 árum síðani fyri ikki at missa fongin. Seinni varð »Lítla nót« eisini gjørd fyri at halda grindini

í drepningi og fáa hana at gera landgongd. Fyrst í 30-árunum varð roynd gjørd á Vestmanna at spreingja eina grind við dynamit, men tað bar ikki til.

Tað eru røddir, ið mæla til at forbjóða grindadrápi, tí *at* fólk ógvast yvir ta óhugnaligu sjón, sum grindadráp kann vera, *at* slíkt ikki sømir seg fyri eitt mentað fólk og tí, *at* hetta ikki er neyðugt longur fyri mettuna, sum fæst til keyps frá øðrum o.s.fr.

Um stórhvalaveiðu er at siga, at eitt nú í Noregi eru reglur, sum fyriskrivað skutil (harpun) við spreingiløðing til stórhvalir, men ikki smáhvalasløgini, døgling og minni.

Royndir eru gjørdar við el-løðing, men tær hava ikki eydnast.

Bólkurin heldur, at vit eiga at vera varin við at gera ein fyrndargaml-an livihátt til brotsgerð fyri tí, um almannagagnið av hesi veiðu ikki er júst livsneyðugt eitt stutt tíðarskeið.

Við tað, at hvalur kemur undir hesa lóg um vernd av dýrum, verður tað skylda hjá tí, sum ætlar at avlíva hval, at vissa sær, at dýrið verður dripið ruddiliga, skjótt og so pínuleyst sum gjørligt.

Eingin royndur háttur lýkur betur hesa treyt enn at skera hvalin á háls aftaná landgongd ella aftaná at vera høgdur.

Mong, og herundir arbeiðsbólkurin, hava ta fatan, at í ávísum grindadrápum, har grindin er niðurstungin, hava hvalirnir verið fyri óneyðugari líðing.

Arbeiðsbólkurin skjýtur tí upp, at tað verður forboðið at stinga grind niður, tá ið hon ikki fæst at gera landgongd. Skotið verður upp, at hetta forboð verður tikið við sum 10. pkt. í § 3.

Ásetingin skal skiljast soleiðis:

Tá ið sýslumaðurin — ella grindaformaðurin í hansara stað — metir, at tað er neyðugt at stinga ein hval fyri at fáa øði í grindina at gera landgongd, kann hann — og bert hann — geva boð um at stinga.

Um grindin ikki ger landgongd, kann sýslumaðurin — ella grindaformenn í hansara stað — geva boð um at høgga við sóknarongli við línu á og annaðhvørt taka hvalin at borði og skera á háls ella at draga hvalin á land og skera á háls sum skjótast.

Aðramáta verður forboðið at brúka vákn og skutil.

Á henda hátt, sum góðar royndir er við, verður eingin særdur hvalur gangandi eftir á vánni ella rikin til havs. Fæst grindin ikki í drepning, eigur hon at verða rikin útaftur.

Annars mælir bólkurin til at umhugsa allar hvalvágir av nýggjum og bert góðkenna tær vágir, sum av royndum lúka hesi krøv fyri einum ruddiligum drápi — og harafturat eru so reinar, at veiðan er fólkamatur, tá ið avtornar. Tey krøv lúka ikki allar hvalvágir í dag.

Ársfrágreiðing 1983 B – 103

**Til § 9.**

*Um gelding*

At gelda kalldýr av neyti, rossi og seyði er gamalt her á landi. Endamálið við geldíng er at taka gessin av dýrinum, tá ið tað er ein vinnuligur fyrimunur.

Tarvurin veksur skjótari enn oksin, men oksin er vanliga spakur at hava við at gera. Har, sum stýring er á alingini, ber ikki til at hava tarv leysan í haganum hjá kvígunum, sum á tann hátt kvidnast óynskt. Neyðugt er tí at gelda allar tarvkálvar, sum skulu í hagan.

Greðingar, sum ikki eru góðkendir eftir lóg til frama fyri rossaaling, sleppa ikki í hagan. Harafturat er geldur hestur lættari at hava við at gera enn greðingur. Áður var vanligt at gelda nøkur veðurlomb, sum vórðu tikin vanliga sum trævetur gamlir geldseyðir. Endamálið var fyri ein part at fáa nakrar góðar feitiseyðir og tí, at geldseyðir ætlaðust at vera góðir slóðarar. Nú er tað undantak, um nakar eigur geldseyð, og fíggjarliga ber geldseyður seg ikki, um nakað skil er í hagarøktini.

Gøltur fer at gima, tá ið hann er um 6 mánðir gamal, og tí er neyðugt at gelda galtargrísarnar, sum ætlast til fólkamat.

Í heilt nýggjari tíð eru fólk farin at gelda hundar, tíkar, fressar og kettur. Endamálið er, at hundar ikki skulu strúka, at tíkar ikki skulu ala hundar til húsa, tá ið tær ganga á illum, at fressar ikki skulu strúka, at kettur ikki skulu leggja, tí tað býður mongum ímóti at drepa kettlingar.

Gelding er meiðsl og hevur pínu við sær. Tí eiga dýr, ið skulu geldast, altíð at verða doyvd, og tað hava bert djóralæknar kunnleika um annaðhvørt at brúka fulla ella staðbundna doyving. Gelding eigur at avmarkast til tað minst møguliga. Bólkurin ásannar, at vinnuligar áneyðir eru fyri at gelda hest, tarvskálv og galtargrísar, men ikki onnur dýr.

Í eini lóg um vernd av dýrum er tað ilt at finna haldgóða grund fyri at gelda kelidýrini, hund, tík, fress og løðu uttan so, at talan er um heilsuliga orsøk, sum djóralækni tekur avgerð um, eitt nú bruna í hvølpamóður á tík o.l. At doyva gess við hormonviðgerð kemur ikki undir hesa reglu.

Eftir 3. stk. verður loyvt øðrum enn djóralæknanum at gelda uttan doyving smáar grísar og kálvar, sum ikki eru meira enn 1 mánað gamlir. Hetta er tó treytað av loyvi frá landsdjóralæknanum, sum vissar sær, at persónurin hevur neyðugan kunnleika til slíka skurðviðgerð av egnum dýrum.

**Til § 10.**
Ongin viðmerking.

**Til § 11.**
Viðvíkjandi seyði verður víst til viðmerkingarnar til § 3, pkt. 6.

Horn á neyti kunnu ikki skaða sjálvt neytið, sum hevur horn. Tey kunnu ikki vaksa í kjálkarnar sum á seyði.

Men neyt, sum ganga leys, kunnu skaða hvørt annað við hornunum, og harafturat er tað ikki so sjáldan, at fólk verða skadd av neytum við hornum.

Tað er tí vanligt nú á døgum at avhyrna kálvarnar, áðrenn teir hava fingið horn. Hetta verður gjørt á tann hátt, at knavarnir og hornrótin verða sviðin við gløðandi jarni undir doyving.

Vanliga eru tað djóralæknar, sum avhyrna kálvarnar, men landsdjóralæknin hevur lært nakrar neytahaldarar at doyva kálvarnar, so at teir hava verið førir fyri at avhyrna kálvar forsvarliga.

Bólkurin metir, at landsdjóralæknin skal vissa sær, at menn, ið fáa loyvi at avhyrna kálvar, hava vist, at teir eru førir fyri at doyva kálvarnar rætt, áðrenn teir fáa loyvi at avhyrna eftir 2. stk.

Tá ið markið er sett við 1-mánaða aldur, er tað ti, at tá er ikki nøkur sló við opi inn í høvdið, sum tað er á eldri neyti.

Tað kann í einstøkum førum verða neyðugt at taka hornini av eldri neyti, eitt nú tá ið neyt við hornum verður slept saman við neytum, ið ikki hava horn. Tá kann hetta bert gerast av djóralækna og undir doyving.

**Til § 12.**
Meginreglan er, at einans djóralæknum er loyvt at skurðviðgera dýr, tí teir eru teir einastu, ið hava gott skyn og kunnleika um forsvarliga viðgerð og doyving.

Undantikin frá hesi reglu eru tó smáting, ið elva stuttvarandi pínu, eitt nú at marka seyð, opna búnan svull og seta tvørra í, spræna heilivág í dýr eftir leiðbeining frá djóralækna, ella eftir samráðing við djóralækna at penta eitt sár ella spjálka ein lim, ella at stinga fyri trøllrið, ið kann vera bráðneyðugt o.t.

**Til Kapittul 3.**
*Eftirlit við, at lógin verður hildin v.m.*

**Til § 13.**
Greinin hevur fyrimynd í íslendskari og norskari lóggávu um dýraverud.

Í 1. stk. eru reglur um skyldur hjá hvørjum borgara, sum kemur fram á eitt dýr, sum er eyðsýnt sjúkt, skatt ella hjálparleyst. Reglurnar áseta, at hvør borgari hevur skyldu at hjálpa slíkum dýri.

Serliga um hjálparleyst dýr skal viðmerkjast, at tað við hesum t.d. verður sipað til dýr, sum er niðursmokkað, hava gingið seg í óføri ella eru solciðis stødd, at tey ikki fáa vatn ella fóður.

Kann tann, sum kemur fram á eitt slíkt dýr, ikki hjálpa dýrinum sjálvur, kann hjálpin veitast við, at ein møguligur eigari ella tann, sum hevur dýrið í hondum, ella løgreglan fær boð, soleiðis at onnur kunnu hjálpa dýrinum.

2. stk. er um skyldur hjá vegfarandi. Ásett verður, at vegfarandi skulu hava fyrilit og vísa varsemi við dýrum, sum eru á ella við veg.

Annars verður víst til §§ 23 og 26 í ferðslulógini.

Eisini verður áskett, at reglurnar í 1. stk. eru galdandi, um eitt dýr er fyri óhappi. Hetta merkir, at vegfarandi skulu steðga og eftir førimuni hjálpa dýrinum.

Brot á ásetingarnar í § 13 hevur revsiábyrgd við sær, samb. § 19, 2. stk.

Um avlíving av einum sjúkum, skaddum ella hjálparleysum dýri skal viðmerkjast:

*1) Dýr, sum eru undir ognar- ella brúksrætti.*
Víst verður til § 16 og viðmerkingarnar til hesa grein.

*2) Onnur dýr.*
Hesi kunnu sum meginregla avlívast av einum og hvørjum, um ásetingarnar í § 8 verða fylgdar, samb. viðmerkingarnar til hesa grein.

**Til § 14.**
Í greinini eru reglur um viðgerð av málum hjá myndugleikum, har tað er staðfest, at eitt dýr av undirfóðring er so avmergjað ella avmaktað, at støðan hjá tí er óforsvarlig.

Í førum, har fóðurstøðan hjá dýrinum ger tað neyðugt, kann løgreglan eftir umbidnari váttan frá djóralækna við dagbót forbjóða, at dýrið verður brúkt fyri eitt tíðarskeið upp til 2 mánaðir. Freistin kann leingjast.

Í 2. stk. eru reglur, sum geva tí, ið hevur fingið boð um álegg, møguleika fyri at leggja spurningin, um grundarlag er fyri álegginum, fyri landsdjóralæknan og møguleika til at krevja avgerðina hjá landsdjóralæknanum lagda fyri rættin.

Tilskilað verður, at eftir vanligum fyrisitingarligum rættarreglum skal tann, sum hevur fingið boð um álegg, undir revsiábyrgd fylgja álegginum, til onnur avgerð møguliga kann fyriliggja.

Somuleiðis gevur ásetingin løgregluni møguleika at leggja eina avgerð hjá djóralækna fyri landsdjóralæknan um, at tað ikki er grundarlag fyri at geva boð um álegg.

Í 3. stk. er fyriskrivað, hvussu løgreglan skal viðgera mál, har krav um avgerð í rættinum fyriliggur.

Eisini verður ásett, at um spurningurin um rættargilduna av einum givnum áleggi verður lagdur fyri rættin, ikki hevur við sær, at áleggið verður útsett, men skal fylgjast, til rætturin møguliga hevur avtikið áleggið.

Eftir 4. stk. kann avgerðin, sum verður tikin við úrskurði, hjá rættinum, ikki leggjast fyri hægri rætt.

Í 5. stk. eru reglur, um útreiðslur til djóralæknar í samband við viðgerð av sakarmáli.

Annars verður vist til sjálva ásetingina, sum er greinað út í æsir.

**Til § 15.**

Greinin snýr seg um tey førí, har undirfóðring áhaldandi fer fram hóast álegg eftir § 14, ella har talan er um mishandling.

Løgreglan kann:

1. flyta dýrið burtur og seta tað aðra staðni ella
2. fáa tað avlívað, um støðan hjá tí er so vorðin, at tað eftir meting frá landsdjóralæknanum ikki eigur at liva.

Útreiðslurnar av tiltøkunum hjá løgregluni ber eigarin ella tann, sum hevur dýrið í hondum.

Ásetingin er neyðug fyri at verja dýrini í teimum førum, har mannagongdin eftir § 14 ikki virkar eftir ætlan, ella har hóttanin um revsiábyrgd annars fyri dýrplágarí ella mishandling ikki er nóg mikil til at bøta um viðurskiftini.

**Til § 16**

Greinin ásetir nærri reglur fyri avlíving av einum skaddum ella sjúkum dýri, sum ikki kann lekjast, og har tað hevur óneyðuga líðing við sær, um dýrið ikki verður avlívað.

Greinin snýr seg — eins og §§ 14 og 15 — einans um dýr, sum eru undir ognar- ella brúksrætti.

Eftir 1. stk. hevur ein og hvør djóralækni, sum kemur til eitt dýr, har hann metir, at dýrið er í slíkari støðu, sum greitt er frá frammanfyri, skyldu til alt fyri eitt at fáa tað avlívað, um eigarin ella tann, sum hevur dýrið í hondum, samtykkir í hesum, og um dýrið er tryggjað, at játtan frá tryggingarfelagnum er fingin.

Reglurnar um játtan frá tryggingarfelag koma neyvan upp á tal, sum er.

Eru nevndu treytir ikki loknar, skal djóralæknin alt fyri eitt boða løgregluni frá viðurskiftunum.

Eftir 2. stk. skal løgreglan eftir móttiknari fráboðan alt fyri eitt biðja um váttan frá landsdjóralæknanum. Um so er at váttanin frá landsdjóralæknanum sigur, at dýrið eigur at verða avlívað, skal dýrið avlívast alt fyri eitt, samanber 4. stk.

Í 3. stk. eru reglur um, tá løgreglan á annan hátt fær kunnleika til, at eitt dýr er í slíkari støðu, at tað eigur at verða avlívað.

Løgreglan skal í slíkum førum biðja um váttan frá djóralækna. Annars eru somu reglur fyri avlíving galdandi, sum greitt er frá frammanfyri.

Eftir 5. stk. skal tað í øllum førum, tá avlíving skal finna stað, gevast eigaranum ella tí, sum hevur dýrið í hondum, álegg um hetta. Verður áleggið ikki fylgt alt fyri eitt, skal løgreglan syrgja fyri, at dýrið verður avlívað.

Í 6. stk. eru reglur um, at eitt skatt dýr kann avlívast alt fyri eitt — uttan mun til tær annars ásettu reglurnar — tá fylgjandi treytir eru loknar:

1. at tað hevur við sær óneyðugar, álvarsligar líðingar fyri dýrið, at tann fyriskrivaða mannagongd verður fylgd,
2. at tað er eyðsýnt, at dýrið ikki fer at koma undan skaðanum ella sum fylgja av hesum eftir fyriskrivaðu mannagongdini kortini verður avlívað.

Í 7. stk. eru reglur um, hvør skal bera útreiðslurnar av avleiðingini. Annars verður vist til ásetingina, sum er greinað út í ærsi.

**Til kapittul 4.**
*Almennar reglur og revsireglur v.m.*

**Til § 17.**
Í greinini er heimild til, at landsstýrið kann áseta umsitingarligar reglur (kunngerðir) fyri

1. flutning av dýrum,
2. slátur av dýrum,
3. avlíving av dýrum,
4. marking av dýrum,
5. serliga viðferð annars av dýrum.

Heimildin er sera rúm. Undir 2. pkt. skjýtur nevndin upp, at tað ikki verður loyvt at svava ella stinga dýr. Tó verður vist til viðmerkingarnar til § 3, 10. pkt., og til viðmerkingarnar til § 8. Serliga til 5. pkt. skal viðmerkjast, at t.d. reglur kunnu ásetast fyri niðurbinding av scyði.

Í greinini er eisini heimild til, at landstýrið kann taka avgerð um tey undir 1-5 nevndu viðurskifti.

Grundgevingin fyri hesum er, at tað fer at verða torført at gera almennar reglur (kunngerðir), sum fevna um øll viðurskifti.

Í eindømis viðurskiftum, har ongar almennar reglur eru fyriskrivaðar, hevur landstýrið heimild til at taka avgerð. Bendir avgerðin á eitt loyvi, eitt forboð ella eini boð, vil brot á eina møguliga treyt fyri einum loyvi ella, um eitt forboð ella eini boð ikki verða fylgd, kunnu revsast eftir § 19, 2. stk. Loyvið, forboðið ella boðini eiga at geva upplýsingar um hetta.

**Til § 18.**
Greinin snýr seg um vinnuligan handil við dýrum.

Umframt kravið um vinnubræv, samb. vinnulógina, skal tann, sum rekur vinnuligan handil við dýrum, hava eitt serligt loyvi til hetta frá løgregluni, og loyvið kann verða tikið aftur, um tann handlandi verður revsaður fyri brot á lógina, ella um dýrini ikki verða hildin og røkt forsvarliga.

Við avgerðina av, um eitt loyvi eigur at verða givið, kann ein meting verða gjørd av, um m.a. hvussu umsøkjarin er skikkaður og um viðurskiftini, har handlað verður — t.d. um hølisviðurskifti.

Í 2. stk. eru undantøk frá kravinum um loyvi frá løgregluni.

Serliga tá talan er um handil við livandi fiski, sum er undantikin frá

kravinum um loyvi frá løgregluni, skal viðmerkjast, at har verður hugsað um handil við aldum fiski.

**Til § 19.**

Í 1. stk. eru revsireglur, sum vísa beinleiðis til dýr og viðurskifti teirra.

Eftir ásetingini verður tann revsaður, sum við overving, vanrøkt ella á annan hátt fer óforsvarliga við dýrum, fyri dýrplágarí við bót, hefti ella fongsli í upp til 1 ár. Hava viðurskiftini borið eyðkenni av mishandling, er revsingin fongsul í upp til 1 ár, við uppafturtøku í upp til 2 ár.

Ásetingin samsvarar við galdandi reglur í § 196 í revsilógini.

Tó er tann broyting, *at* revsimarkið er hækkað í teimum førum, har talan er um dýrplágarí, men ikki mishandling, *at* dómurin er fongsulrevsing, tá viðurskiftini hava borið eyðkenni av mishandling, og *at* revsimarkið fyri uppafturtikna mishandling er hækkað til 2 ár.

Í 2. stk. eru revsireglur fyri

1. brot á forboð ella boð eftir lógini ella á reglur eftir lógini,
2. at skúgva treytir fyri einum loyvi eftir lógini ella eftir reglum eftir lógini til viks,
3. at givin forboð ella boð eftir lógini ella eftir reglum eftir lógini ikki verða fylgd,

Revsimarkið er, uttan so at annað er ásett, bót ella hefti.

Í 3. stk. eru serligar revsireglur fyri, tá ein djóralækni skúgvar fráboðanarskyldu sína eftir § 16, 1. stk., til viks.

Revsimarkið er bót.

Í 4. stk. er ásett, at í teimum førum, tá eitt brot er gjørt av einum partafelagi, lutafelagi ella líknandi, kann felagið sum slíkt koma undir revsiábyrgd.

Eftir hesi áseting kann t.d. eitt hagastýri koma undir bótarábyrgd fyri brot.

**Til § 20.**

Eftir reglunum í hesi grein kann ein persónur við dómi verða frásagdur rættin at eiga, brúka, halda, slakta ella sum heild at fáast við dýr persónliga.

Forboðið kann avmarkast til at snúgva seg um ávís dýrasløg.

Eisini er ásett, at ein persónur kann verða frásagdur hendan rætt til allar tíðir ella fyri eitt nærri ásett tíðarskeið.

Treytin fyri at frásiga henda rætt er, at viðkomandi

1. við dómi verður sagdur sekur fyri mishandling av dýrum ella
2. fyri áður at hava gjørt seg sekan í dýrplágarí ella øðrum broti á reglurnar í lógini ella á § 196 í revsilógini av nýggjum verður sekur í slíkum broti.

Brot á forboðið verður revsað við bót.

Aftur at hesum kann løgreglan, tá talan er um brot av forboðnum, flyta dýrið burtur og fáa tað selt ella avlívað uttan so, at eigarin áðrenn eina av løgregluni ásetta freist syrgir fyri, at dýrið verður flutt aðrastaðni.

Útreiðslurnar av tiltakinum hjá løgregluni verða bornar av tí, sum hevur brotið forboðið.

Í 2. stk. er ásett, at tað er undir revsiábyrgd í tænastu síni at lata ein persón útinna verk, sum er móti forboðnum.

Revsimarkið er bót.

Eftir galdandi lóggávu, lóg nr. 152 frá 17. mai 1916, samb. fyriskipan nr. 110 frá 1. mars 1919, § 3, kann rætturin til at útinna slátur fyri eitt tíðarskeið ella fyri allar tíðir við dómi verða frásagdur tí, sum hevur gjørt seg sekan í grovari mishandling av dýrum.

Ivasamt er, um tað í galdandi lóggávu annars er heimild til at frásiga rættin til at fáast við dýr.

Henda heimild skuldi, um so var, funnist í revsilógini, §§ 78-79 (sum hon er orðað við lóg nr. 286 frá 18. juni 1951 — broytt við lóg nr. 212 frá 4. juni 1965) »om rettighedsfortabelse på grund af strafbart forhold« — serliga § 79, 1. stk., 2. pkt.

Spurningurin, um tað eftir hesi áseting er heimild til at frásiga rættin til partvís at fáast við dýr, er ikki lagdur fyri dómstólarnar.

**Til § 21.**

Greinin snýr seg um skylduna hjá foreldrum, verjum, húsbónda og øðrum, sum hava umsjón við børnum undir 15 ár, at syrgja fyri, at børn ikki gera brot á lógina.

Eftir 1. stk. verður tann, ið umsjónina hevur, revsaður fyri brotið, um hann hevur verið vitandi um brotið, uttan at hann hevur roynt at fyribyrgja tí.

Eftir 2. stk. verður tann, ið umsjónina hevur, revsaður við bót ella hefti, um groft ósketni er orsøk til, at hann hevur verið óvitandi um brotið, sum barnið hevur gjørt.

Endamálið við greinini er, samstundis sum gjørt verður vart við, at børn undir 15 ár ikki kunnu revsast, at vaksin eiga at leggja børnum

Løgtingstíðindi 1953/8 — 106

eina við at vera góð við dýr og at fara væl við dýrum og hava umsjón við, at børn ikki bróta lógina.

**Til § 22.**
Greinin ásetir, at mál um brot á lógina verða viðgjørd sum løgreglumál, og at útreiðslurnar eftir lógini — um annað ikki er ásett — verða bornar sum útreiðslur hjá løgregluni.

**Til § 23.**
Eftir 1. stk. kemur lógin í gildi, tá ið bon verður kunngjørd.

Tó kemur § 3, 6. pkt., ikki í gildi fyrr enn 1. oktober 1989. Um grundgevingina fyri hesum verður víst til viðmerkingarnar til § 3. Landsstýrið eigur áðrenn nevndu tíðarfreist at kunngera, at hendan áseting kemur í gildi.

Í 2. stk. eru ásetingar um, at galdandi lóggáva um dýravernd verður avtikin.

*ARBEIÐSBÓLKURIN*
*TIL AT KANNA DÝRAVERNDARLÓGINA*

*Tórshavn, tann*

*D. J. Bærentsen* *M. Nepper-Christensen* *Justines Olsen*

*Hanus Wardum*

/
/

*Sjúrður Rasmussen*
*skrivari hjá nevndini*

Skjal nr. 14 A

Skjal til løgtingsmál nr. 128:

# Uppskot til løgtingslóg um stuðul til musikkskúlar

**Álit**

**viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um kommunalar musikkskúlar.**

*Greitt úr hondum hevur nevndin, ið Landsskúlafyrisitingin setti 17. november 1982 at gera uppskot til lóg um musikkundirvísning.*

Tórshavn 1984

**Fororð**

1. apríl 1982 boðaði Føroya Landsstýri til fundar við tí endamáli at fáa eina musikkskipan fyri Føroyar. Hesir stovnar og feløg vóru umboðað:

Føroya Landsstýri
Landsskúlafyrisitingin
Royndarmusikkskúlin
Meginfelag fyri Føroysk Hornorkestur
Klaksvíkar Musikkskúli
Tórshavnar Musikkskúli

Niðurstøðan á hesum fundi var, at landsskúlastjórin saman við Føroya Landsstýri fekk ta uppgávu at seta eina nevnd, ið skuldi fyrireika eitt framhald av tí royndarmusikkundirvísing, ið var byrjað skúlaárið 1981/82. Tá ið úrslitið av hesi skipan var greitt, skuldi ein nevnd setast, ið skuldi gera eitt uppskot til lóg um musikkundirvísing.

Tann 17. november 1982 setti landsskúlastjórin eina nevnd, ið fekk hesar uppgávur:

1. at gera eitt uppskot til bygnað av eini musikkundirvísing, har endamálið er, at næmingarnir ogna sær kunnleika og fimi innan tónleik á ymiskum stigi og á ymiskum instrumentum.
2. at gera eitt uppskot um innihald, teoretiskt og praktiskt, sum útbúgvingin skal fevna um.
3. at koma við tilmæli um, hvussu henda musikkundirvísing í høvuðsheitum eigur at skipast.
4. at meta um tørvin á og møguleikar fyri at fáa lærarafólk til hesa undirvísing.
5. at meta um útreiðslurnar í samband við stovnsetan av hesi musikkundirvísing.

Í nevndina komu:

Arnold Abrahmsen
Hans E. í Brekkunum
Súsanna Danielsen
Ólavur Hátún
Erik Petersen
Alex Sólstein

Nevndin hevur havt 12 fundir og er komin fram til fyriliggjandi uppskot, sum hervið verður sent landsskúlastjóranum til framhaldandi viðgerð.

Nevndin hevur havt eina landsumfatandi undirvísingarskipan fyri eyga, men av tí at hon eisini hevur sæð fyrimunir við tí lokala fyritakseminum, so hevur verið roynt at sameint hesi bæði sjónarmið.

Við hesi ætlan fáa vit eina musikkskipan, sum kann geva teimum ungu sum eldru møguleika at fáa musikkundirvísing við væl útbúnum lærarakreftum á staðnum ella í økjum, har tey búgva.

Undir viðgerðini av uppskotinum hevur verið kannað, hvussu hini Norðurlond hava skipað sína musikkundirvísing.

Okkara vón er tí, at avvarðandi myndugleikar taka undir við hesum uppskoti og teimum hugsanum, ið uppskotið leggur upp til.

*Arnold Abrahamsen* — *S. Davidsen*
*H.E. í Brekkunum* — *Alex Sólstein*

**Uppskot um stuðulslóg til kommunalar musikkskúlar.**

**§ 1**
Eftir reglunum í hesi lóg verður latin studningur úr landskassanum til musikkskúlar, ið hava til endamáls í samarbeiði við heim, skúla og aðrar musikkfelagsskapir at menna musikalsku evni og gávur næminganna og leggja grundarlag undir einum ríkum musikklívi á staðnum.

**§ 2**
Til tess at røkka hesum, skal musikkskúlin geva musikalska almannaútbúgving, vokal- og/ella instrumentalundirvísing, undirvísing í samanspæli og samansangi, kunning um mentunararvin og um nýggjar og gamlar framburðarhættir innan musikkin og hava næmingaframførslur.
*2. stk.* Undirvísingin kann enda við roynd.
*3. stk.* Landsskúlaráðið ásetur nærri reglur hesi undirvísing viðvíkjandi.

**§ 3.**
Landsskúlaráðið skal góðkenna skúlan, áðrenn studningur verður veittur. Góðkenningin skal vera knýtt at eini kommunu ella einum kommunalum felagsskapi.

*2. stk.* Fyri at fáa studning skal skúlin harumframt lúka hesar treytir:
1. undirvísingin skal standa øllum í boði
2. undirvísingin skal vera skipað eftir reglum smb. § 2, 3. stk.
3. næmingagrundarlagið skal í minsta lagi vera 30.
4. skúlin skal í minsta lagi hava ein fastan lærara,
5. næmingar skulu gjalda eitt árligt gjald, sum er góðkent av Landsskúlaráðnum.

**§ 4**
Studningur til musikkskúlar verður veittur soleiðis:
1. 50% av lærara— og leiðaralønum
2. Ferðaútreiðslur til lærarar, sum undirvísa á fleiri musikkskúlum.

**§ 5**
Teir lærarar, ið settir verða, skulu í minsta lagi hava útbúgving, ið er samsvarandi musikkpedagogiskum prógvi frá musikkkonservatorium.

2. stk. Lærarar verða settir av viðkomandi kommunu ella kommunufelagsskapi eftir tilmæli frá tí í § 6 nevndu nevnd.

3. stk. Landsstýrið skal góðkenna lærara— og leiðaralønir.

**§ 6**
Til tess at samskipa musikkundirvísingina í landinum verður sett nevnd við umboðum fyri musikkskúlarnar og Landsskúlafyrisitingina.

2. stk. Landsskúlaráðið ger nærri reglur fyri virki nevndarinnar.

**§ 7**
Henda lóg kemur í gildi

**Viðmerkingar:**
Lógin er soleiðis skipað, at tað eru kommunur ella kommunalir felagsskapir, ið seta musikkskúlar á stovn, og at landskassin letur studning, tá ið ávísar treytir eru uppfyltar sí. viðmerkingarnar til tær einstøku greinir. Sambært lógina um skúlafyrisiting mugu skúlarnir roknast sum privatir skúlar, hóast tað er ein kommuna, sum stendur fyri teimum; samanber § 27 í lóg um skúlafyrisiting.

§ 1 í lógini ásetur endamál skúlans og fyrstu treytina fyri at fáa studning. § 2 ásetur í høvuðsheitum, men skal Landsskúlaráðið eftir 3. stk. gera undirvísingarætlan. Til at gera hetta, er ætlanin, at landsskúlastjórin setur eina lesiætlanarnevnd við serkønum fólki. Í 2. stk.

verður sagt, at skúlin kann enda við roynd, men er hetta ikki nøkur treyt.

Skúlin skal, áðrenn studningur verður latin, verða góðkendur av Landsskúlaráðnum, sí § 27, 1. stk, 1. pkt. í lóg um skúlafyrisiting, og sum omanfyrinevnt, er tað ein treyt fyri góðkenning, at skúlin er knýttur at eini kommunu ella kommunalum felagsskapi. Hvat viðvíkur grundini fyri hesum verður víst til almennu viðmerkingarnar.

Sambært § 3. 2. stk. 1. pkt. er ein treyt fyri studningi, at undirvísingin stendur øllum í boði, t.v.s. at øll, sum ynskja tað, kunnu koma á skúlan. Tað eru ongar aldursavmarkingar fyri at kunna luttaka í undirvísingini cfr. fólkaskúlalógina og frítíðarlógina, har meginparturin av tónleikaundirvísing, sum hingartil hevur verið, hevur verið skipað eftir.

2. pkt. staðfestir, at undirvísingarætlanin skal vera fylgd, sí eisini § 27, 2. stk. í lógini um skúlafyrisiting.

Hvat viðvíkur 3. og 4. pkt., so hanga tey nakað saman, og verða tey tí viðgjørd undir einum. Nevndin metir, tað er neyðugt við einum føstum lærara fyri at seta skúlan á stovn, og ætlanin er so, at hesin skal undirvísa í einum ella tveimum instrumentum og annars eisini geva ta meira almennu undirvísingina sambært § 2. Tað er eisini týdningarmikið við einum slíkum fólki á staðnum fyri at fáa gongd á musikklívið í bygdini.

Næmingatalið er sett til 30; men er ikki hugsanin, at tann fasti lærarin skal undirvísa øllum hesum næmingum í einum instrumenti, men er ætlanin, um tørvur er á tí, at ferðalærarar skulu koma og undirvísa teimum, um tann fasti lærarin ikki er førur fyri at undirvísa.

*Dømi:*

*Ein musikkskúli verður stovnaður við einum næmingagrundarlagi uppá 35. Ein fastur lærari verður settur, hvørs høvuðsinstrument er klarinett, men kann hann eisini geva byrjunarundirvísing í klaveri.*

*Ynski næminganna er hetta:*

*10 klaver, 7 floytu, 5 klarinett, 3 violin, 10 messing.*

*Tann fasti lærarin undirvísir teimum 5 klarinettunum og 10 klaverspælarum (treytað av, at allir eru á byrjunarstigi), meðan ferðalærarar mugu undirvísa í floytu, violin og messing.*

*ad. 5. pkt.*
Nevndin heldur, at tað er neyðugt, at næmingar gjalda fyri at ganga á musikkskúla. Hetta lættir fyri tað fyrsta kommununi um rakstraútreiðslur, og haraftrat ger tað, at næmingar ikki bert koma á skúlan sum ein viðfáningur. Gjaldið fyri at luttaka í royndarmusikkskúlanum hevur verið kr. 750,00, og metir nevndin hetta vera rímuligt. Møguleiki eigur tó at vera gjørdur fyri bæði heilum og hálvum fríplássum.

Eftir § 4 verður studningurin úr landskassanum 50% til læraralønir og 50% til leiðaralønir. Tað mest nattúrliga verður ivaleyst, at tann fasti lærarin eisini verður leiðari, men hugsast kann, at á summum plássum verða fleiri lærarar, og at so ein av teimum verður leiðari við møguliga serligari viðbót.

Hædd er ikki tikin fyri møguligari pensiónsskipan og tí, hon kostar, men um ein slík verður fingin í lag, eigur landskassin eisini at gjalda 50% av hesi. Ferðaútreiðslur, sí ad § 6. Hvat øðrum rakstraútreiðslum viðvíkur so sum høli, ljós, hita og reingerð, verða hesar fíggjaðar av kommununi, men kann næmingagjaldið nýtast til hesar útreiðslur.

Viðvíkjandi viðmerkingum til 2. pkt. verður vist til viðmerkingina til § 6.

§ 5. 3. stk. ásetur, at landsstýrið skal góðkenna lønirnar, bæði fyri at tær verða eins fyri alt landið, og fyri at tryggja, at tær verða á einum rímiligum støði.

*ad. § 6.*
Sum nevnt frammanfyri, ásetir lógin, at musikkskúlar verða kommunalir skúlar, men hóast hetta, verður neyðugt við einum samarbeiði millum skúlarnar, fyri at fáa læraratørvin hjá øllum nøktaðan, víst verður til frammanfyristandandi dømi. Tímatalið hjá tí einstaka læraranum er ikki ásett í lógini, men hevur tað, í royndarmusikkskúlanum, verið 20 tímar pr. viku. Hetta førir við sær, at um hildið verður fast við hetta tal, verður onguntíð tørvur á t.d. einum heilum cello-, obo-, ella fagottlærara nakrastaðni á musikkskúlanum, hóast tað helst við tíðini verða nóg nógvir næmingar kring alt landið til hesi instrument. Hetta ber í sær, at slíkir lærarar mugu ferðast millum skúlarnar. Fyri at kunna fáa samlaða tørvin kannaðan, er tað tí neyðugt við eini slíkari nevnd. Musikknevndin heldur eisini, tað er skilagott, at nevndin ger tilmæli til tey føstu størvini soleiðis, at t.d. ikki allir skúlarnir skulu sita við einum føstum klaverlærara ella messinglærara, og at øll hini instrumentini mugu verða røkt av ferðalærarum. Fyri at samskipanin kann virka, er ivaleyst eisini skilabest, íð hvussu so er í byrjanini, at

nevndin í samráð við Landsskúlafyrisitingina lýsir eftir lærarum. Hevast má í huga, at sokjast má í útlondum, av tí at vit ikki enn hava nóg mikið av útbúnum føroyingum.

Eitki er sagt í lógini um, hvussu nógvir limir skulu vera í nevndini, men er hóskandi við einum limi úr hvørjum musikkskúla, sum verður talið til treytað av talinum á musikkskúlum

**Kostnaðarmeting.**

Tað ber ikki til hjá nevndini nágreiniliga at seta upp, hvat kostnaðurin av musikkskúlanum verður, men skal her verða roynt at gera eina meting við støði í kostnaðinum av royndarmusikkskúlanum og metingum á musikklærarum kring alt landið, sí skjal 3.

Sum upplýst í alitinum, eru í skúlaárinum 1983/84 10 fulltíðarsettir lærarar, og verða lønarútreiðslurnar fyri 10 mánaðir 1,3 mill. kr.

Nevndin metir, at 15 fulltíðarsettir lærarar kunnu nokta tørvin fleiri ár fram í tíðina. Um hesir verða lønt ir samsvarandi 23 25, lønarflokki í tænastumannalógini, verður árliga lønin hjá hvørjum lærara umleið kr. 170.000,00 fulltíðarpeningur frá mánaðar. (1 mun pr. 1. oktober 1983). Samlaðu lønarútreiðslurnar verða sostatt kr. 2.550.000,00. Landskassans partur av hesum er, sambært lógaruppskoti, 50% ella kr. 1.275.00,00. Aftur at hesum skal landskassin gjalda ferðaútreiðslur, sum kunnu metast til umleið kr. 75.000,00 árliga.

Landskassin skal eisini gjalda 50% av leiðaralønum mett til kr. 100.000,00 árliga

Samlaði partur landskassans verður sostatt kr. 1.450.00,00 árliga.

Kommununna partur til lønir verður tann sami sum landskassans, men skulu kommununar harumframt gjalda hinar rakstraútreiðslurnar av skúlunum, men verða, sum áður nevnt, tænningagjaldið at viga nakað upp ímóti hesum útreiðslum.

| **Útreiðslur** | **Landskassin** | **Kommunan** |
|---|---|---|
| lønir | 1.250.000,00 | 1.250.000,00 |
| leiðaraviðbót | 100.000,00 | 100.000,00 |
| ferðaútreiðslur | 75.000,00 | 0,00 |
| aðrar útreiðslur | 0,00 | 500.000,00 |
| **Inntøkur:** | | |
| næmingagjald | 0,00 | 300.000,00 |
| samlaðar útreiðslur | 1.425.000,00 | 1.550.900,00 |

Løgtingstíðindi 1983B – 107

Vit føroyingar eiga ikki eina musikktraditión sum onnur lond, tá ið hugsað verður um instrumentalan tónleik. Tað vokala, kvøðingin og sálmasangurin, hevur verið okkara musikkur, og tað er ikki fyrrenn í okkara øld, at instrumentalspæl hevur tikið seg upp av álvara her í landinum.

Musikkuppaling hevur ligið í hondunum á privatpersónum, ið hava havt hug og hegni at læra frá sær. Mong nøvn kundu verið nevnd á fólki, sum á privatum grundarlagi hava borið musikklívinum uppi bæði í býi og á bygd, og í tónleiki eins og í øðrum føri verður tað altíð so, at hugur og framtak hjá hinum einstaka setir dám á fyritakssemi og framburð.

Í seinni árum hevur tikið seg upp rættiliga nógv undirvísing í sambandi við verandi orkesturarbeiði, soleiðis í mong ár við strókaraundirvísing innan Tórshavnar Musikkskúla, og táið tað í 50-árunum og frameftir gjørdist meira og meira vanligt hjá hornorkestrunum at fáa sær professionellar venjarar uttaneftir, sum so eisini komu at taka sær av byrjunarundirvísing, kom slíkur gróður í, at vit kunnu siga, at vit á hesum øki hava eins góðan standard og grannalond okkara. Orkestrini hava sjálvi havt fíggjarligu ábyrgdina av hesum arbeiði og hava verið meira ella minni bundin av tilvildarligum vælvilja hjá tí almenna.

Fyrst í 60-unum tók seg upp hugtakið sjálvboðin musikkundirvísing fyrst í Svøríki og seinni eisini í hinum Norðurlondum. Musikkskúlar, meiri ella minni kommunalir og við meira og minni tilknýti til fólkaskúlan, eru hesi seinastu árini vorðnir meira og meira vanligir í londum uttan um okkum og hava havt kollveltingarligan týdning fyri alla musikkuppaling. Børnini kunnu her fyri bert lutvíst gjald *eftir* og á ávísum støðum *í* skúlatíðini fáa einstaklingaundirvísing í instrumentalum spæli, og tónleikalívið hevur á henda hátt fingið eina sociala breidd sum ongantíð áður. Vanliga um 25% og stundum fleiri av skúlabørnum hava tikið við hesum tilboði, og fylgja hevur eisini verið, at tað ongantíð áður hava verið so nógv og so góð kór og orkestur í okkara grannalondum sum nú.

Ein bati kom í, tá ið Føroya Løgting seinast í 60 árunum setti 200.000,00 kr. á fíggjarlóg løgtingsins til setan av musikklærara til sang og tónleik. Treytin fyri at fáa studning av hesi konto var, at kommunan sjálv skuldi gjalda 50% av útreiðslunum, og hini 50% skuldu so fáast í studningi frá Føroya Landsstýri. Tó var hesin studningur avmarkaður til 30.000,00 kr. um árið. Hetta var í eini tíð, tá ið 60.000,00 kr. var ein góð ársløn, og tí bar til at seta eina musikkundirvísing á stovn í fleiri bygdum t.d. Runavík, Klaksvík og

Fuglafirði. Hesar kommunur settu ein musikklærara at taka sær av musikkundirvísingini í bygdini. Í nøkur ár gekk hetta so tolutiga, men tá ið studningurin ikki hækkaði í mun til prístalið, varð torført at reka musikkundirvísing eftir hesi skipan.

Longu í 60-árunum og eisin seinni hava royndir verið gjørdar at fáa í lag eina breiða musikkundirvísing svarandi til áður nevndu í hinum Norðurlondum í fyrsta lagi í Tórshavn. Nógv hevur verið skrivað, og fundir hava verið hildnir, men ikki fyrr enn á vári 1981 komu realitetir, burtur úr hesum royndum. Eftir fund millum musikkfólk, umboð fyri Landsskúlafyrisitingina og Tórshavnar býráð og landsstýrismenninar í menta- og undirvísingarmálum gav Føroya Landsstýri í brævi til kennar, at teir vóru fúsir at fara undir musikkpedagogiskt royndarár við trimum professionellum íslendskum musikkfólkum, Hrefna Eggersdóttir, Kjartan Oskarson og Bjørn Árnason. Tórshavnar býráð gekk eisini við til hetta, og seinni komu eisini Gøtu og Fuglafjarðar kommunur upp í tiltakið. Fíggjarliga grundarlagið var, at landsstýrið og kommunur bóru hvør sína helvt av bróðurpartinum av útreiðslunum, børnini/foreldrini lótu sín part, meðan Landsskúlafyrisitingin gav loyvi til at gera sum best gagn burturúr verandi møguleikum innan skúla- og kvøldskúlakarmar, eins og t.d. hornorkestrini hava kunnað gjørt tað.

Umstøðurnar, hesi fólk fingu at arbeiða undir, vóru stak vánaligar, og tá ið spurningurin um framhald av hesi undirvísing kom upp á tal, kallaði Føroya Landsstýri saman til fundar at viðgera hendan spurning. Umboð fyri tónleikalívið í Føroyum, Landsskúlafyrisitingina o.a. vóru eisini við til henda fund. Úrslitið av hesum fundi var, at Landsskúlastjórin fekk ta uppgávu at seta eina nevnd, ið umboðaði umsiting og tónleikalív.

Í hesa nevnd komu:
Hensar Ellingsgaard
Ólavur Hátún
Erik Petersen
Arnold Abrahamsen
Alex Sólstein.

Nevndin hevði sín fyrsta fund fríggjadagin 16. apríl 1982. Einki skrivligt »kommissorium« var at arbeiða eftir, men til fundin vóru hesi punkt sett upp, sum bendu á, hvat nevndin arbeiddi við.

1) Tinna fyribilsskipan fyri musikkundirvising í komandi ári.
2) Meta um, hvussu stórur læraratorvurin er.
3) Fáa undirvísingina í gongd í góðari tíð.
4) Hvussu undirvísingin kann samskipast við verandi undirvísing.
5) Vísa á, hvar peningur kann fáast til vega.
6) Kanna tørvin av musikkundirvísing í Føroyum.

*ad. 1.* Ein fyribilsskipan varð sett upp, har hesi pláss vóru roknað við: Tórshavn, Miðvágur/Sandavágur, Fuglafjørður, Klaksvík, Kollafjørður og Klaksvík.

*ad. 2.* Nevndin metti, at brúk var fyri 11 lærarum í fyrstu syftu, men tá ið talið var hildið at verða nóg so stórt, varð á seinni fundi komið fram til eitt tal upp á 8, ið var tað lægsta, talan kundi vera um, skuldi nøkur undirvísing fáast í lag.

*ad. 3.* Undirvísingin átti at byrja um somu tíð, sum fólkaskúlin byrjaði undirvísingina aftan á summarfrítíðina.

*ad. 4.* Av tí at ein samskipan mátti fara fram, var neyðugt, at lærararnir ferðaðust til teir ymsu skúlarnar, tí ikki er møguligt at seta ein lærara í hvørji einstakari lærugrein í hvørji bygd, men neyðugt var, at fleiri bygdir tóku seg saman at gera brúk av sama lærara. T.d. er ikki brúk fyri meira enn einum lærara í cello í øllum Føroyum, og tí er neyðugt, at hesin ferðast ímillum skúlarnar.

*ad. 5.* Nevndin kom eisini við einum uppskoti um gjald av royndarmusikkundirvísingini. Her varð skotið upp, at landið skuldi gjalda 50%. Eisini varð eitt uppskot um næmingagjald sett fram. Skotið varð upp, at hetta varð sett til 750,00 kr. um árið. Kommunan og landsstýrið skuldi hava hvør síni 50% av hesum gjaldi.

*ad. 6.* Musikkroyndarárið 1982/83 skuldi vísa tørvin á musikkundirvísing, og út frá hesum tølum átti so ein víðari útbygging at farið fram.

Tann 10. juni vóru hesi størv lýst leys:
1 starv í violin
1 starv í cello
2 størv í tvørfloytu og klarinett
2 størv í messinginstrumentum
2 klaver

Til hesi støv vóru sett:

| | | |
|---|---|---|
| Kanny Sambeleben, violin | 1 | stórv |
| Magne Synnevág, træblásinstrument | 1 | " |
| Petur Grønsgaard, klaver | 1 | |
| Jørgen Villum Hansen, klaver | 1 | " |
| Helga Gerðalíð, floytu | ½ | |
| Albert Meek, messinginstrument | ½ | |
| Oddvør Johansen, orgul | ½ | |
| Anders Brødsgaard, klaver | ½ | " |
| Warren Stewart, cello | 1 | " |
| tilsamans: | 7 | stórv |

Hesi lærarafólk vóru sett fyri alt økið, ið fyr er nevnt. Lærarnir komu at ferðast nakað, men tað var júst fyrimunurin við hesum tiltaki.

Landsskúlastjórin setti eina skjótt arbeiðandi nevnd við fólki frá Landsskúlafyrisitingini, ið skuldi gera reglur fyri hesa framhaldandi undirvísing. Uppgávan var ikki løtt, tí enn var ikki greitt, hvussu nógvir næmingar fóru at melda seg til hesa undirvísing.

Býtið millum lærararnar var hetta:

*Kanny Sambleben* 16 tímar í Tórshavn og 4 tímar í Eysturoynni.
*Magne Synnevåg* 15 tímar í Tórshavn og 5 tímar í Eysturoynni.
*Jørgen Villum Hansen* 10 tímar í Tórshavn og 10 tímar í Eysturoynni.
*Petur Grønsgaard* 20 tímar í Vágum.
*Helga Gerðalíð* 10 tímar í Klaksvík.
*Albert Meek* 10 tímar í Fuglafirði
*Oddvør Johansen* 10 tímar í Tórshavn
*Anders Brødsgaard* 10 tímar í Kollafirði
*Warren Stewart* 4 tímar í Klaksvík, 4 tímar í Fuglafirði og 6 tímar í Havn.

Fyri at vera við í hesi skipan skal kommunan gjalda 50% av tí undirvísing, ið verður givin í kommununi. Kommunurnar skulu sjálvar biðja um upptøku í royndarmusikkskúlaætlanina og siga frá, hvussu nógva undirvísing tær vilja gjalda. Tó avmarkaði upphæddin, ið Føroya Landsstýri hevði sett av til hesa undirvísing, talið á kommunum, ið kundu verða við í hesum tiltaki.

Leiðarin av undirvísingini á teimum ymsu plássunum er kvøldskúlaleiðarin. Lønin til lærararnar var sett til 12.320,00 kr. um mánaðin fyri 20 tímar á 60 minuttir.

Arbeiðið hjá Royndarmusikkskúlanum seinasta ár gekk tó ikki uttan trupulleikar, men úrslitið var rættiliga gott, sum eisini kundi váttast við góðum musikkskúlakonsertum, og sum krúnan á verkinum var eisini Føroya Symfoniorkestur stovnað av teimum báðum lærarum skúlans, Magne Synnevåg og Kanny Sambleben.

Avgjørt var at halda áfram við hesum royndarári eitt ár aftur at í skúlaárinum 1983/84, og var nevnd sett at taka sær av hesi framhaldandi undirvising og at gera tógaruppskot til musikkundirvísing.

Nevndin er hendan:
Hans Erland í Brekkunum
Ólavur Hátún
Alex Sólstein
Erik Petersen
Súsanna Danielsen
Arnold Abrahamsen

Nevndin fekk hetta »kommissorium« at arbeiða eftir:

1) at gera eitt uppskot til bygnað av eini musikkundirvísing, har endamálið er, at næmingarnir ogna sær kunnleika og fimi innan tónleik á ymiskum stigi og á ymiskum instrumentum,
2) at gera uppskot um innihald, teoretiskt og praktisk, sum útbúgvingin skal fevna um.
3) at koma við tilmæli um, hvussu hendan musikkundirvísing í høvuðsheitunum eigur at skipast.
4) at meta um tørvin á og møguleikarnar fyri, at fáa lærarafólk til hesa musikkundirvísing.
5) at meta um útreiðslurnar í sambandi við stovnsetan av hesi musikkundirvísing.

Nevndin hevði sín fyrsta fund 14. desember 1982. Av tí at so langt var útliðið, varð farið í holt við at skipa fyri framhaldi av undirvísingini í komandi skúlaári. Nevndin kom til tað úrslit, at møguleiki var fyri at seta 10 tónleikalærarar í skúlaárinum 1983/84. Við at meta út frá tí næmingatali, ið hevði verið í skúlaárinum 1982/83, metti nevndin, at tá ið so nógvar kommunur komu afturat, var neyðugt at hækka læraratalið. Undirvísingin kom at fevna um hesar kommunur: Tórshavn, Kollafjørð, Miðvág/Sandavág, Sørvág, Eiði. Fuglafjørð, Gøta, Lorvík, Skála, Tvøroyri og Vág. Sostatt høvdu kommunur, ið umboðaðu 60% av fólkatalinum í Føroyum, tikið undir við royndarmusikkskúlaskipanini.

Nevndin setti uppskot um at lýsa hesi størv leys:

1 starv í violin
1 starv í cello
1 starv í klarinett
1 starv í tvørfloytu
2 størv í messinginstrumentum
4 størv í klaver

Størvini fevndu um alt økið, ið hevði tikið undir við royndarmusikkskúlaskipanini, og nevndin skuldi so býta lærarakreftirnar út eftir tørvi.

Sjálvt um henda undirvísing í ár hevur ment seg til at umfata bygdirnar Vág, Tvøroyri, Sørvág, Eiði, Skála og Leirvík aftur at teim fyrr nevndu, so hava trupulleikar verið, sum best vísa, at tíðin er komin, at lógarheimila til fasta reglugerð, gjaldskipan og leiðslu bæði á lokalum og á landsbasis.

Viðvíkjandi setan av lærara í teimum ymsu økjunum verður víst til talvu nr. 1.

Fyrimunir við hesi skipan, ið nú verður roynd á 3. ári, eru fleiri.

1) Fleiri bygdir, ið ikki hava møguleika at seta sína egnu undirvísing á stovn, kunnu nú fáa henda møguleika gjøgnum royndarmusikkskúlan.
2) Allar bygdir eru so smáar, at ikki kann verða givið børnum nakað fjølbroytt undirvísingartilboð uttan so, at fleiri kommunur ganga saman um hetta. Eitt fjølbroytt tilboð er fyritreytin fyri Føroya symfoniorkestri.
3) Tað er lættari at flyta ein lærara enn fleiri næmingar.

Tað, vit hava saknað við hesi skipan, er ein leiðsla, ið skal samskipa alla undirvísing, og eitt samarbeiði við teir lokalu stovnarnar, ti tann liður, ið skal taka sær av hesum, vantar. Eisini hevur verið torført at gjørt eina ágreinilliga ætlan, av ti at vit frammanundan ikki hava kent næmingatalið.

Nú kann verða spurt um, hvat vit tó skulu við øllum hesum tónleiki, um hann ikki bert er marglæti og undirhald. Til tað er at siga, at psykologiskar og pedagogiskar kanningar hava staðfest, at tað at fáast aktivt við tónleik hevur menningandi týdning fyri hin einstaka, at tónleikur sum neyvan onnur fyrilrigdi kann bera boð og skapa samband millum menniskju, og sostatt hevur alstóran socialan týdning. Og so er at nevna tað, sum vanliga verður knýtt at tónleiki, tey etisku og listarligu virði, sum eru ein sjálvsagd fylgja av einum framkomnum musikklívi. Tað hevur áður verið borið fram, at vit í musikklívinum ikki eru á hædd við onnur mentunarlig øki sum t.d. bókmentir og myndalist. Tey nógvu kór og orkestur og í seinni árum smærri sang- og instrumentalbólkar bera boð um hug og evni at fáast við tónleik, og ikki minst hesar nógvu konsertirnar sýna almennan áhuga fyri hesum virkseminum. Men samstundis kunnu vit staðfesta munin á teimum, sum við viðføddum gávum so at siga hava vunnið sær ein fermleika av sær sjálvum, og so á teimum, sum hóast smáar fortreytir og praktiskar trupulleikar so at siga hava brotið sær út til framhaldandi útbúgving í øðrum londum. Tað eru hesi, sum so við og við koma at mynda føroyskt musikklív, tað eru tey, sum gera, at tankin um eitt føroyskt symfoniorkestur ikki er utopiskur, tað eru tey, sum so við og við koma at avirka sansin fyri, hvat ið er dygd, og hvat ið bert hevur løtuvirði innan tað altumfatandi, sum tónlistin er. Men støðið er eitt fjølbroytt, kvalificerað musikkundirvísingartilboð til allan ungdóm í Føroyum.

**Skipan av musikkskúlunum.**

Tær royndir, ið gjørdar eru tey 3 árini, vit hava havt eina royndarmusikkskúlaundirvísing, hava víst, at stórur tørvur er á slíkari undirvísing, men hon hevur eisini víst, at skal henda undirvísing halda fram, so er neyðugt við eini fastari skipan. Neyðugt er, at ein skúli við lærara og leiðslu verður settur á stovn.

Vit hava sæð fyrimunin við eini landsumfatandi skipan, men samstundis hava vit saknað eina umsiting á staðnum, ið skal skipa fyri. Nevndin er komin til tað úrslit, at best er at byggja upp á tær umsitingarligu royndirnar, viðkomandi stovnar úti um landið hava, gera nýtslu

av teimum, og samstundis geva kommununum upp í hendi sjálvar at skipa fyri síni musikkundirvísing.

Samstundis hava vit hildið møguleikunum opnum fyri eini undirvísing, ið fevnir um alt landið, so at næmingar, ið spæla upp á instrument, sum vanliga hava lítið næmingatal, eisini fáa møguleika fyri at fáa undirvísing.

Tá ið tað er avmarkað, hvussu smáar eindir vit kunnu hava, verður neyðugt hjá kommunum at samarbeiða og í mongum førum at hava felags lærarar.

Uppskot nevndarinnar miðar ímóti, at kommunurnar sjálvar skipa fyri síni undirvísing, seta lærarar, kanna grundarlagið fyri møguligum næmingatali, hvørja undirvísing teir skulu bjóða, seta leiðara at taka sær av teimum praktisku spurningum, kanna møguligt samarbeiði við aðrar kommunur og seta seg í samband við høvuðsnevndina við málum av felags áhuga.

Um lógaruppskotið verður viðtikið, fer hetta at skapa størri møguleikar fyri tí musikkundirvísing, ið ætlanin er at byggja upp, og fer hetta eisini at gera, at meira fæst burtur úr lærarakreftunum. Tað hevur verið ein av vansunum við verandi skipan, at nevndin, ið hevur skipað fyri, ikki hevur havt samband við viðurskiftini á staðnum.

Ein stórur partur av musikkundirvísingini hesi seinastu árini er farin fram á kvøldskúlunum, fyri ein part tí, at tað er bíligari, men eftir at kommunamna gjald til kvøldskúlaundirvísing er sett til 50%, so kemur musikkskúlaundirvísingin at kosta kommununi nakað tað sama sum kvøldskúlaundirvísingin.

Nevndin hevur eisini hugsað sær, at landið verður býtt upp í musikkøki — sí talvu 4.

Í hesum økjum kann felagskommunalur musikkskúli setast á stovn. Fyrimunirnir høvdu verið fleiri. Møguleikar høvdu verið fyri í hesum økjum at sett lærarar í ávísum instrumentum, sum hvør kommuna sær ikki hevði verið før fyri. Her kann nevnast klaverundirvísing og undirvísing í messing og træblásinstrumentum, t.d. cellospæl má harafturímóti fevna um alt landið.

Tað, at landið verður býtt upp í øki, merkir tó ikki, at lærararnir skulu undirvísa og búgva á einum stað, men at hesi øki eru felags um ávísa tónleikaundirvísing. Ferðingin hevði verið nógv avmarkað, og hetta hevði eisini ført við sær, at lærararnir høvdu støðast betur.

Royndarmusikkundirvísingin kann ikki halda fram á sama hátt sum higartil, tað er hon orðin alt ov stór í vavi til, men má fáast inn í fastari karmar.

**Læraratørvurin**

Tað 1. árið byrjaði royndarmusikkskúlaundirvísingin við 3 lærarum. Hetta tal øktist 2. árið til 7, og 3. árið eru 10 lærarastørv skipað í teimum økjunum, ið royndarmusikkskúlaskipanin fevnir um. Sjálvt um vit hava skipað fyri so nógvari undirvísing, so hava vit ikki verið førir fyri at nøkta tann tørv, ið er til staðar. Hetta kemst av, at torført hevur verið at fingið lærarar til ávísa undirvísing og eisini tí, at umstøðurnar til ferðing vóru torførar. Roynt hevur verið at avmarka ferðingina mest møguliga og so vítt gjørligt bert til bygdir, har lætt hevur verið at komið til. Vit hava brúk fyri 15 lærarum í næstu framtíð, sí skjal nr. 3, har tann metti læraratørvurin komandi ár er settur upp.

Truplasti spurningurin, nevndin hevur havt at arbeitt við, er læraratørvurin. Tað hevur ikki verið møguligt at fingið fatur á teimum lærarum, ið brúk hevur verið fyri. Sum er, eru ov fáir føroyingar, sum hava ta útbúgving, ið lúka tær treytir, ið settar eru til hesa undirvísing, so neyðugt hevur verið at lýst í hinum Norðurlondum og Bretlandi eftir lærarum. Sum er undirvísa 2 bretar, 3 svenskarar, 4 danir, 1 íslendingur (giftur í Føroyum) og 1 frá Sweits (giftur í Føroyum) við royndarmusikkskúlan. Ein onnur orsøk er, at royndarmusikkskúlin hevur ikki nakra fasta skipan, men lærarar kunnu bert setast fyri styttri tíðarskeið. Hetta ger, at torført er at fáa nakran at søkja starv, ið teir bert kunnu rokna við at hava nakrar fáar mánaðir. Av tí sama hava vit ikki fingið fatur í teimum bestu, og hetta ger, at vit fáa ikki eina samanhangandi framhaldandi undirvísing, og ivasamt er, hvussu haldgóð ein musikkundirvísing við skiftandi lærarakreftum er.

Tað sigur seg eisini sjálvt, at, tá ið undirvísingin er so víttfevnandi, fer at verða torfort at fáa alt at laga seg, um eingin leiðsla er.

Hesum trupulleikum høvdu vit sloppið undan, um vit høvdu eina fasta skipan. Høvdu vit kunnað játtað umsøkjarunum føst størv, so høvdu fleiri søkt, og teir høvdu uttan iva støðast longur. Henda royndarmusikkundirvísing er nú vorðin so víttfevnandi, at trupulleikarnir verða alt ov stórir, um vit ikki fáa eina fasta skipan fyri lærarar og leiðslu.

Sum tíðin líður, so fara vit eisini at fáa føroyingar sum undirvísarar, tí fleiri føroyingar eru undir útbúgving, og roknast má við, at tann musikkundirvísing, ið nu er í gongd, fer at skapa áhuga og trivna hjá enn fleiri til at leita sær musikkútbúgving.

Meirilutin í nevndini tekur undir við hesum áliti og mælir til, at uppskotið kemur í gildi frá komandi skúlaári, so musikkundirvísingin kemur í gongd aftan á summarfrítíðina 1984.

## Musikkundirvísing í skúlaárinum 1983/84 (lærarastørv)

**Talva 1**

| | Violin | Cello | Orgul | Klaver | Træbl. | Messing | Onnur instr. | | Tímar tils. | Lærara-størv |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Sørvág | | | | 3 | | 6 | | | 10 | 0.5 |
| Tórshavn | 6 | 5 | | 34 | 20 | 10 | 8 | | 83 | 4.1 |
| Miðv/Sandav | | | | 15 | | | | | 15 | 0.75 |
| Kollafjørður | | | | 10 | 3 | | | | 13 | 0.65 |
| Skála | 3(7) | | | | | 6 | 10 | | | 0.5 |
| Gøtu | | | | 10 | | | | | 10 | 0.5 |
| Fuglafjørður | 6(8) | 2 | | 3 | 4 | 10 | | | 25 | 1.25 |
| Klaksvík | | | | | 10 | | | | 10 | 0.5 |
| Tvøroyri/Vág | | | | | | 15 | | | 15 | 0.75 |
| Leirvík | 3(4) | | | 3 | 4 | | | | 10 | 0.5 |
| Eiði | | | | | | 6 | | | 6 | 0.3 |
| **Tilsamans** | **18** | **7** | | **78** | **41** | **53** | **8** | | **205** | **10.3** |

**Tilsamans 205 tímar og gevur hetta tilsamans 10.3 lærarastørv.**

# Musikkundirvísing í skúlaárinum 1983/84

**Talva 2**

| | Violin | Cello | Orgul | Klaver | Trebl. | Messing | Onnur instr. | | Tímar tils. | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Sørvág | | | | 5 | | 9 | | | 14 | |
| Tórshavn | 9 | 6 | | 51 | 30 | 15 | 12 | | 123 | |
| Miðv/Sandav | | | | 23 | | | | | 23 | |
| Kollafjørður | | | | 15 | 5 | | | | 20 | |
| Skála | 5 | | | | | 9 | | | 14 | |
| Gjógv | | | | 10 | | | | | 10 | |
| Fuglafjørður | 9 | 3 | | 5 | 6 | 15 | | | 38 | |
| Klaksvík | | | | | 10 | | | | 10 | |
| Tvøroyri/Vág | | | | | | 15 | | | 15 | |
| Leirvík | 5 | | | 5 | 6 | | | | 16 | |
| Eiði | | | | | | 9 | | | 9 | |
| **Næmingatal tilsamans** | | | | | | | | | **292** | |

## Metti lærarataðvurin

| | Violin | Cello | Orgul | Klaver | Trebl. | Messing | Onnur instr. | | Tímar tils. | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðuroyar | | | | | | | | | | |
| Eysturoy | | | | | | | | | | |
| Streymoy | 2 | 1 | 4(5) | 1 | 1 | 4(5) | 1 | | 15 | |
| Vágoy/ Vestmanna | | | | | | | | | | |
| Sandoy | | | | | | | | | | |
| Suðuroy | | | | | | | | | | |

*Landið upphýtt í 7 musikkskúlaøki. Í hvørjum av hesum økjum verður grundarlag fyri at seta á stovn musikkskúlar við frá einum til fleiri fastum lærara-kreftum.*

**Skjal 14 B**

## Fororð til minnilutauppskot til lóg um Føroya Musikkskúla.

Tá ið eg, eftir at hava verið við í nevndararbeiði, sum hevur miðað imóti føroyskari musikkskúlalóg, nú kortini valdi at koma við egnum minnilutauppskoti, er orsøkin tann, at eg meti ikki, at uppskotið, sum meirilutin er steðgaður við, fer at fáa eitt so fjølbroytt og so landsumfatandi musikkskúlavirksemi í lag, sum eg fyri mín part havi havt hugsjónir um, og sum eg eri sannførdur um, at tað eru møguleikar fyri. Tað verða eftir mínari meting børn og ungfólk í mongum bygdum, sum ikki koma at fáa innlit í tí livsríkidømi, sum tað er at koma í virkið samband við tónleik, og um enn onkrar av teim størru bygdunum kunnu hava fortreytir fyri at fáa eitt ávíst musikkpedagogiskt arbeiði í lag, og smærri kommunur hava møguleika at skapa sær slíkt grundarlag við at ganga saman, fer hetta ikki at geva sama úrslit sum tað, at landið skipar fyri einum musikkundirvísingartilboð, sum kommunur eftir egnum ynski og uttan stórvegis ómak kunnu fáa lut í.

Mær er tað greitt, at uppskotið hjá meirilutanum er orðað ikki sum lóg um landsumfatandi musikkskúlaskipan, men bert sum lóg um studning til musikkskúlar, av ótta fyri at koma til at skerja kommunalan avgerðarrætt. Hetta tykir mær verður heldur ikki gjørt eftir mínum uppskoti, sum bert hevur ein meira miðvísan, dynamiskan dám. Tá ið Royndarmusikkskúlin var komin í lag, og nevnd seinni var sett til eisini at umsita hesa roynd, var tað alla tíðina mín áskoðan, at tað í hesi royndartíð ráddi um, at allir partar, landspolitikarar, kommunalpolitikarar, musikklærarar og musikkfólk aftan fyri tiltakið, skuldu kunna hittast til tess at kunna meta um, hvussu skipanin royndist, men slík kommunikatión hevur als ikki verið. Tá tað kom at falla mær í lut at gera egið uppskot til musikkskúlalóg, loyvdi eg mær at kalla avvarðandi kommunalpolitikarar saman til fundar til tess at tosa um, hvussu royndarmusikkskúlaskipanin hevur vignast, og hoyra, hvørja áskoðan menn høvdu um eina komandi fastari skipan.

Referat frá hesum fundi er hjálagt hesum skrivum.

Annars meti eg ikki, at hetta mál hevur fingið ta breiðu viðgerð, sum skuldi gjørt tað búgvið til lóggávu.

*Havnin 8. 4. 84*
**Ólavur Hátún**

**Lóg um Føroya Musikkskúla**

*1. grein:* Settur verður á stovn Føroya Musikkskúli.

*2. grein:* Endamál skúlans er:
at fremja musikalska menning frá fyrstu barnaárum at stuðla og gagna sang/musikkuppalingini í fólkaskúlanum at veita næmingum í øllum aldrum og kring alt landið dygdargóða undirvísing í flest møguligum instrumentum, geva teimum teoretiska og musikksøguliga kunning og høvi til samanspæl í smærri og størri bólkum at geva teim serliga evnaríku eina undirvísing, sum kann miða ímóti framhaldandi útbúgving á hægri stigi.

*3. grein:* Landið verður býtt sundur í musikkskúlaøki. Í hvørjum øki kann setast á stovn 1 deild av Føroya Musikkskúla.

*4. grein:* a) Føroya Landsstýri setir leiðara við musikkpedagogiskum kvalifikatiónum, sum skal samskipa alla musikkundirvísingina, og sum við ábyrgd yvir fyri landsstýri og kommunum hevur avgerðarrætt í fakligum, pedagogiskum og fíggjarligum málum. Landsstýrið letur gera reglugerð um virki musikkskúlaleiðarans, sum skal góðkennast av Landsskúlaráðnum.

b) Bý/bygdarráðini í hvørjari deild seta deildarleiðara at taka sær av praktisku umsitingini í samstarvi við landsins musikkskúlaleiðara. Samsýning verður latin fyri hetta arbeiði eftir nærri reglum.

c) Lærarar í hvørjari deild mynda lærararáð, sum tekur sær av fakligum og pedagogiskum áhugamálum. Allir lærarar innan Føroya Musikkskúla mynda landslærararáð.

d) Bý/bygdarráðini í hvørjari deild seta nevnd sum millumlið millum kommunur og leiðslu Føroya Musikkskúla. Deildarleiðarin tekur uttan atkvøðurætt lut á fundum nevndarinnar, eins og lærarar, næmingar og foreldur at næmingum kunnu senda umboð á fund uttan atkvøðurætt.

e) Deildarleiðararnir við ábyrgd yvir fyri avvarðandi deildarnevndum mynda saman við umboðum fyri Føroya Kommunufelag, Tórshavnar Býráð, Landsskúlafyrisitingina og Tónlistasamband Føroya eina landsnevnd, sum skipar seg við formanni og næstformanni, meðan umboðið fyri Landsskúlafyrisitingina er skrivari. Hendan landsnevnd samskipar scráhugamálini hjá einstøku deildunum og gevur tilmæli gjøgnum Landsskúlafyrisitingina til Føroya Landsstýri. Leiðarin á musikkskúlanum tekur lut á fundum í landsnevndini. Umboð fyri landslærararáðið kunnu taka lut og koma við uppskotum, men hava ikki atkvøðurætt. Landsnevndin hevur í minsta lagi 2 fundir um árið, annan í januar og hin í september.

*5. grein:* Lærarar við Føroya Musikkskúla eiga at hava hægri tónleikaútbúgving.

*6. grein:* Landsskúlastjórin gevur eftir innstilling frá landsnevndini tilmæli til Føroya Landsstýri um setan av lærarum. Reglugerð um lønar- og arbeiðsviðurskifti hjá lærarum verður at góðkenna av Landsskúlaráðnum.

*7. grein:* Musikkskúlaleiðarin ger vegna landsnevndina eftir tilmæli frá deildarnevndunum ársfíggjarætlan fyri skúlan, sum verður at góðkenna av Føroya Landsstýri.
Roknskaparárið er álmanakkaárið.

*8. grein:* Landið rindar 60 % og kommunurnar 40 % av lønum og ferðarútreiðslum. Kommunurnar lata høli og rinda fyri ljós, hita og tey instrument, sum mugu vera á staðnum. Fyri næmingar yvir skúlaaldur kann verða tikið næmingagjald eftir nærri reglum.

*9. grein:* Á hvørjum ári verður upphædd sett av á fíggjarætlanina til keyp av instrumentum, nótatilfari o. ø., sum musikkskúlaleiðarin vegna landsnevndina gevur tilmæli um, og landsstýrið setir reglur fyri.

*10. grein:* Musikkskúlaøki, sum vilja reka sjálvstøðugan musikkskúla, fáa 60 % av læraralønunum afturgoldin úr landskassanum, treytað av, at landsstýrið metir undirvísingina at lúka treytirnar sambært 2. grein í hesari lóg.

*11. grein:* Føroya Landsstýri setir í kunngerð nærri reglur fyri virki musikkskúlans.

*12. grein:* Hendan lóg kemur í gildi

Omanfyristandandi er mitt minnilutauppskot til føroyska musikkskúlalóg.

*Tórshavn 31. mars 1984*
**Ólavur Hátún**


leiðari
LANDSLIÐ
leiðar-
leiðari
LÆRARAR
NÆMINGAR
FORELDUR

## *Viðmerkingar til minnilutauppskotið til lóg um Føroya Musikkskúla.*

*ad 1. grein:* Fram um bert at gera lóg um studning til tær kommunur, sum ynskja at stovna musikkskúla, tykir mær tað at vera stórur fyrimunur — eisini eftir teim royndum, sum Royndarmusikkskúlin hevur givið — at lógarfesta eina landsumfatandi musikkskúlaskipan. Tað er einasti møguleiki at tryggja børnum og ungfólki í teim smærru og meðalstóru bygdunum eitt kvalificerað musikkundirvísingartilboð, og tey størru plássini hava eisini bert fyrimun av tí.

*ad 2. grein:* Endamálsgreinin má sipa beinleiðis til tað, sum okkara musikkundirvísingarskipan eigur at miða ímóti, hetta at børn so tíðliga, sum til ber, kunnu koma undir miðvísa musikalska ávirkan (musikkvísindaligar kanningar hava staðfest tann stóra týdning, hetta hevur fyri musikalsku menningina í seinnu árum), at musikkskúlin ikki isolerar seg burtur frá fólkaskúlanum, so sum onnur lond hava ringar royndir av, at landsins musikkskúlaskipan í mest møguligan mun skal koma øllum landinum til góðar, vera ein ítøkiligur liður í føroyskum bygdarmenningarpolitikki, at musikkskúlin skal hava eitt breiðari og djúpari innihald enn bert tað at læra at spæla uppá, at skúlin leggur dent á at skipa fyri konservatoriifyrireikandi undirvísing, sum er ein fortreyt fyri einum framkomnum musikklívi í Føroyum.

*ad 3. grein:* Einasti møguleiki fyri fjølbroyttari musikkundirvísing í teim smærru og teim miðalstóru bygdunum og somuleiðis fyrimunur fyri øll pláss er tað, at bygdir og kommunur verða lagdar saman í musikkskúlaøki, sum tað ber væl til at umsita undir einum. Tá ber eisini til at fáa fastbúgvandi musikklærarar, hvat ið er av størsta týdningi fyri skapan av einum livandi musikkumhvørvi. Hendan sundurbýting kemur best av sær sjálvum, so hvørt sum musikkundirvísingin tekur seg upp kring alt landið, men ein møguleiki er tann, sum verður vístur á kortinum aftast í álitinum frá musikknevndini.

*ad 4. grein:* a) Landsskúlaráðið og seinni Føroya Landsstýri hava felt mína grein um ein landsins musikkskúlalæriðara inn í meirilutauppskotið. Eftir mínari meting kemur slíkur musikkskúlalæriðari best til gagns, um hann kemur at virka innan eina landsumfatandi skipan, eisini tí at tað má vera hansara uppgáva at elva til, at musikkundirvísingartilboðið í mest møguligan mun verður eins gott um alt landið. b), c), d), og e): Øll 4. grein, sum eisini er sett grafiskt upp á hjálagda skjali, er eitt uppskot um skipan og umsiting á slíkan hátt, at arbeiðslag skúlans, sjálvsavgerðarrættur kommununnar og teirra, næmninganna, foreldranna og læraranna høvi til demokratiska ávirkan verða best møgulig. Greinin átti helst at verið orðað styttri á tann hátt, at hon vísti til reglugerð, sum tað ber betri til at broyta so hvørt, sum royndir fáast.

*ad 5. grein:* Aðalhugsanin aftan fyri Royndarmusikkskúlan var at virka fyri einari dygdargóðari musikkundirvising í Føroyum við einans væl kvalificeraðum lærarakreftum. Ynskiligt var, at allir okkara lærarar høvdu bæði fakliga og pedagogiska útbúgving og haraftrat helst eisini undirvísingarroyndir, men slíkir lærarar hanga ikki á trøunum, og tí havi eg bert orðað kravið um hægri útbúgving, sum so støða verður at taka til við hvørja lærarasetan.

*ad 6. og 7. grein:* Onki at viðmerkja.

*ad 8. grein:* Eftir mínum tykki skipast landsins musikkskúli best á tann hátt, at landið ber størra partin av læraralønar- og ferðarútreiðslum. Næmingagjaldið, sum hevur verið í Royndarmusikkskúlanum, hevur ikki munað so nógv á fíggjarætlanini, men vit vita, at foreldur, sum sita fíggjarliga illa í tí ella hava fleiri skúlabørn, aftra seg við at leggja hesar krónurnar á borðið, og tá helst í heimum, har musikalski áhugin ikki frammanundan er vorðin vaktur. Hesum sociala skeivleika hava tey havt eyga fyri t.d. í Noreg, har meira og meira verður gingið burtur frá næmingagjaldi í skúlaskyldigum aldri. Tó ber tað sjálvandi til at áseta eitt minni gjald fyri eina styttri royndartíð upp á t.d. 3. mánaðar, at geva systkinarabatt o.a.t.

*að 9. grein:* Meðan það í 8. grein verður lagsað um instrument sum klaver, trummuset o.a., sum ikki so væl kunnu flytast millum skúlar ella bygdir, er her talan um smærri instrument, sum eru til láns ella biliga leigu til byrjunarundirvísing, og um dýrari instrument sum t.d. obo, fagott ella cello, sum næmingar ikki kunnu væntast at fara og keypa sjálvir tey tyrstu árini áðrenn tað er vorðið teimum greitt at viðkomandi instrument verður lerra høvuðsinstrument. Royndarmusikkskúlin fær longu, sum er, illa virkað vegna trot á nótatillari.

*að 10. grein:* Hendan grein skal tryggja stórri kommunum rættin til við landsstuðningi fult og heilt at reka og umsita egnan musikkskúla. Tó eigur í slíkum føri helst at fylgja tann skylda við at tryggja eins gott musikkundirvísingartilboð til smærri bygdir uttanum, sum annars lætt verða við sviðið soð.

*að grein 11 og 12:* Ongi at viðmerkja.

Altrat omanfyristaðandi kundi verið sett grein um møguleika fyri prógvtoku, um eftirlit við ársroynd, um individuellar progressivar roynder eftir enskum mynstri, sum eisini verður nýtt t.d. í Íslandi, o.a.t. Slíkir møguleikar eiga at vera, men rúmast helst best í einari kunngerð.

Skjal 15

Skjal til løgtingsmál nr. 31:

# Løgtingslóg
# um veðhald fyri láni
# til Nordafar A/S

# NOTAT

um

*figgjarligan stuðul og møguliga rekonstruktion av*

*NORDAFAR A/S*

*1. Stoðan í vár 1984.*

Nordafar fekk um árskiftið at vita frá grønlendskum myndugleikum at teir skuldu fáa eina kvotu uppá 1.000 tons, sum teir kundu latið skip um at fiska til avreiðing til Nordafar.

Leiðslan á Nordafar metti, at ein kvota uppá bert 1.000 tons um fram landingarnar frá grønlendskum útroðrarmonnum uppá 1.000 1.500 tons vóru ein alt ov lítið grundarlag til at kunna lata í vinnu á sumri 1984.

Leiðslan í Nordafar royndi tí í Grønlandi at spyrja grønlendskar myndugleikar um møguleikarnar fyri at fáa stórri kvotu. Í hesum fekk hon stuðul frá sterkum kreftum í Grønlandi m.a. útróðrarmonnum, arbeiðsmannafelagnum í Nuuk og Nuuk kommunu.

Eisini landsstýrið royndi í samrøðum við grønlendskar landsstýrismenn at kanna um tað var í grønlendskari interessu at gera tað møguligt hjá Nordafar at lata uppaftur raksturin í summar.

Tað hevur nú vorðið sostatt, at Nordafar hevur fingið eina kvotu uppá 2.000 tons aftur at Nordafar skulu sostatt nú hava eina kvotu uppá 3.000 tons umframt ley 1.000 í 500 tonsini, sum teir kunnu taka við frá grønlendskum útróðrarmonnum, tað er alt í alt 4.500 tons.

Harumframt stendur Nordafar í boði at keypa ein grønlendskan trolara, sum ongantið rættuliga er komin í rakstur, av tí at grønlendska felagið, sum keypti hann í Onglandi, kom í figgjarligar trupulleikar frá byrjan av. Við trolaranum fylgir ein toskakvota uppá 3.500 tons og ein kongafiskakvota uppá 1.000 tons.

Trolarin er frystitrolari við verksmiðju umborð. Hugsanin er, at hann kann avreiða til Nordafar um summarið eftir tørvi og annars fiska og framleiða sjálvur restina av árinum.

Trolarin kann fáast til keyps fyri umleið 20 milj. kr. uttan útgjald. Enn hevur Nordafar ikki havt høvi til at kanna trolaran, og er tí ikki enn avgjørt, um felagið er áhugað í at keypa hann.

Útlitið fyri veiðumøguleikum í 1984 er dapurt. Vegna kulda og vánalig ísviðurskifti hevur tað ikki verið gjørligt hjá KGH-trolarunum at fiska tosk higartil í ár. Teir hava lagt um til rækjur í staðin. Tað er tí rættuliga ivasamt, hvussu stórur áhugin er t.d. ímillum føroyskar trolaraeigarar at binda seg til at fara til Grønlands at fiska fyri Nordafar í summar, um ikki fiskiútlitið batnar munandi.

Tað er heldur ikki so lætt hjá Nordafar at fara at rigga til drift í summar, av tí at felagið hevur stóra skuld orsakað av uppsamlaðum halli í 1983 og undanfarnum árum.

Tað er ikki møguligt at fara í holt við at lata Nordafar uppaftur í 1984, uttan at veðhald fæst fyri rakstrarláni til 1984, og í hesum sambandi verður helst eisini neyðugt heilt ella lutvís at gera skil á teirri uppsamlaðu skuldini.

M.a. er tað ein spurningur, um hvørt nevndin í Nordafar A/S kann átaka sær framvegis at hava ábyrgd av felagnum við teirri skuld, sum felagið hevur, og teimum smáu møguleikunum fyri at svara skyldur sínar, uttan so er at okkurt munagott verður gjørt við gomlu skuldina.

*2. Føroysk og grønlendsk áhugamál í at lata Nordafar halda fram.*

Frá føroyskari síðu hevur verið roynt at hildið lív í Nordafar í nógv ár, hóast tað hevur givið hall.

Hugmyndin aftan fyri hesar royndir hevur verið, at tað var í føroyskari interessu at halda Nordafar viðlíka.

Roknað varð við, at Nordafar, tá ið tær politisku og biologisku fortreytirnar vóru til staðar, aftur kundi gerast grundarlag fyri føroyskari fiskiveiðu og fiskavirking í Grønlandi.

Hetta hevði gagnað føroyskum fiskimonnum við at givið teimum arbeiðspláss á føroyskum fiskiskipum við Grønland, føroyskum arbeiðs-

monnum við at skapt nøkur summararbeiðspláss í Føroyingahavnini og føroyskum skipaeigarum við at teir kundu fingið skip teirra í vinnu í Grønlandi. Við teirri støðu, sum Føroyar hava verið í seinastu árini við ov stórum fiskiflota til teir føroysku grunnarnar, hevði tað eisini gagnað út frá einum fiskipolitiskum heildarsjónarmiði, um nøkur skip ein part av árinum kundu farið burtur av landgrunninum og aðrastaðni at royna.

Treytin fyri, at føroyskt virksemi í Nordafar kann taka seg uppaftur, er sjálvsagt, at grønlendingar loyva hesum, og treytin fyri tí er, at grønlendingar halda hetta vera í teirra egnu interessu.

Seinastu árini er komið skilliga fram, at grønlendingar meta tað at vera í teirra interessu, at Nordafar verður uppihildið.

Grønlendinskir útróðrarmenn ynskja at hava Nordafar at avreiða til um summarið. Grønlendskir arbeiðsmenn ynskja at fáa vinnu har um summarið. Nuuk kommuna, sum Føroyingahavnin liggur í, hevur áhuga í teimum skattainntøkum, sum standast av virkseminum hjá Nordafar.

Fortreytin fyri føroysk/grønlendskari samvinnu um Nordafar er sostatt til staðar.

Bæði føroyska og grønlendska landsstýrið meta Nordafar at vera ein hóskiligan karm um føroyskt/grønlendskt samarbeiði á fiskivinnuøkinum.

Frá føroyskari síðu hevur verið roynt at geva grønlendingum innlit í og ávirkan á Nordafar, m.a. við at velja grønlendskar limir inn í nevndina. Eisini hevur landsstýrið fleiri ferðir boðið grønlendska landsstýrinum, at grønlendingar koma uppí Nordafar sum medeigarar í sambandi við eina rekonstruktión av felagnum. Grønlendska landsstýrið hevur sagt seg at hava áhuga fyri hesum, men hevur roynt at útsett spurningin, inntil onnur meira átrokandi mál vóru loyst, serliga í samband við grønlendska yvirtøku av KGH.

Tað er sostatt ikki bert í føroyskari, men í grønlendskari interessu at Nordafar verður bildið viðlíka og letur uppaftur á sumri 1984.

Lata føroyingar virkið aftur nú, eftir at Nordafar hevur fingið so nógva vælvild frá grønlendsku myndugleikunum, má roknast við at hetta fer at skaða viðurskiftini ímillum Føroyar og Grønland á fiskivinnuøkinum munandi.

Tí verður roknað við, at føroyskir myndugleikar royna at finna útvegir fyri, at felagið kann halda fram við virkseminum í Føroyingahavnini og so vítt gjørligt at tryggja, at føroyingar royna at veiða mest møguligt av teimum kvotunum, ið tillutaðar eru Nordafar.

Spurningurin verður síðan, hvussu ið hetta best verður fyriskipað, og hvørjar møguligar broytingar í viðmiðtunum hjá Nordafar eru nevðugar sum partur av eini slíkari loysn.

*3. Ognarviðmiðtini í Nordafar*

Nordafar A/S, ið er heimahoyrandi í Keypmannahavn, hevur eina partapening uppá 2 milj. kr.

Hað er L/F Grønlandsfelagið, sum eigur allan partapeningin.

Eigararnir at L/F Grønlandsfelagnum eru hesir:

| | | |
|---|---|---|
| Føroya Fiskasøla | 550.000 kr. | 38,46% |
| Føroya Fiskimannafelag | 100.000 kr. | 7,00% |
| Føroya Skiprara- og Navigatørfelag | 100.000 kr. | 7,00% |
| Føroya Løgting | 550.000 kr. | 38,46% |
| Føroya Reiðarafelag | 130.000 kr. | 9,10% |
| **Tilsamans** | **1.430 000 kr.** | |

Hað almenna, løgtingið, hevur sostatt sum nú er 38,46% av partafelagnum í móðirfelagnum hjá Nordafar.

Nordafar hevur í nógv ár arbeitt við landskassaveðhaldinum, sum eru vorðin effektiv.

Samtað skuld hjá Nordafar við landskassaveðhaldi er 13 mió. kr. + 1 mió. kr. fyri Aleq, sum kann roknast við blívur effektivt við 200-300.000 kr. Hartil koma rentur, sum landskassin sambært sína veðhaldsskyldu eisini heftir fyri.

Við lóg nr. 11 frá 14. apríl-1975 veðhelt landskassin fyri láni til Grønlandsfelagið til keyp av partapeninginum hjá Utrustning í Nordafar A/S og fyri láni til rakstrarpening o.a. Hetta veðhald bleiv effektivt og er saldo nú kr. 8.216.000,— og er renta ikki tilskrivað.

Nevnast kann eisini, at landsstýrið fyri at tryggja ognirnar í Føroyingahavnini, í vár hevur goldið 700.000 kr. til vaktarhald o.a.

Teir privatu partahavararnir í Nordafar hava ikki viljað átikið sær veðhaldsskyldur fyri felagið. Teir hava ikki mett, at hað er privatøkonomiskt vælgrundað at átaka sær veðhaldsskyldur fyri raksturin av Nordafar, men hava hildið, at hetta átti hað almenna at gera, um so var, at hað almenna helt hað vera til frama fyri landið sum heild.

Henda meting hjá teimum privatu stendur við, soleiðis at tað í dag eru landsmyndugleikarnir, ið gera av, um teir við at játta ella sýta fyri veðhaldi loyva Nordafar at halda fram ella noyða tað at halda uppat.

*4. Broytingar í ognarviðurskiftunum í Nordafar.*

Talan hevur verið um fleiri ferðir, tá ið søkt hevur verið um veðhald, at landskassin sum størsti ognari hjá felagnum Nordafar A/S, sum sjálvt hevur negativan eginpening, átti at tikið fylgjurnar av viðurskiftunum og gjørt seg til eina eigara av Nordafar A/S. Hetta verður mett at koma at geva »reinar linjur«.

Tað er meting landsstýrisins, at ein slík loysn hevði verið óheppin av fleiri orsøkum. M.a. hevði tað eftir landsstýrisins áskoðan gjørst truplari at samráðast við grønlendsku myndugleikarnar um rímuligar loysnir fyri Nordafar um slíkar samráðingar, við tað at landsstýrið átti felagið 100%, gjørdust til stjórnarsamráðingar. Royndirnar higartil vísa, at tað er ein fyrimunur fyri Nordafar A/S sum stovn at tað er skipað sum privat partafelag, sum kann virka í Grønlandi undir somu korum sum aðrar grønlendskar fyritøkur og sum kann venda sær til grønlendskar myndugleikar sum eitt privat virki og ikki sum ein stjórnarstovnur.

Tað verður tí mælt frá einari loysn, sum førir við sær, at landsstýrið verður at standa sum eina eigari í Nordafar A/S.

Sum áður nevnt eigur landsstýrið 38,46% av eginpeninginum í móðurfelagnum, og velur løgtingið 3 limir av teimum 9 nevndarlimunum í partafelagnum.

Landsstýrið metir ikki nakra grund vera til størri løgtingsluttøku, hvørki sum eigari ella í nevndini.

Tann ávirkan, ið løgtingið og landsstýrið ynskja at hava á gongdina í Nordafar A/S, eigur tað at verða møguligt at seta treytir fyri veðhaldinum til Nordafar A/S.

Í sambandi við eina sanering av gomlu skuldini hjá Nordafar A/S, sum landskassin hevur veðhildið fyri, er tað ætlan landsstýrisins at tryggja sær pant í einum meiriluta av partabrøvunum í felagnum, við atkvøðurætti, so leingi felagið stendur í skuld til landskassan. Á henda hátt verður landsstýrið at hava avgerandi ávirkan á aðalfundum í felagnum.

**Skjal til løgtingsmál nr. 145:** **Skjal 16**

# Navnalóggávan

*Tórshavn, den 3. maj 1984*

Efter anmodning fra formanden for lovudvalget skal jeg meddele følgende vedrørende færøsk navnelov.

I lagtingssag nr. 47/1977 — færøsk navnelov — blev det vedtaget at nedsætte et udvalg, der skulle fremkomme med forslag til fornavne, efternavne, stavning af navne, fortegnelse over navne, og til et fast udvalg til at tage sig af tvivlsspørgsmål vedrørende navne.

Af betænkningen i denne lagtingssag fremgår, at sagen tidligere havde været fremme i 1969 og, at det af betænkningen fra 1969 fremgik, at lovgivningen om personnavne efter hjemmestyreloven hverken var A- eller B-anliggender. Området kunne derfor ikke overtages efter hjemmestyreloven i dens nuværende form.

En ændring af den nuværende navnelovgivning — lov nr. 89 af 22. april 1904 om navneforandring — kan som retstilstanden er for tide ske på 2 måder.

a) Den nye danske lov nr. 193 af 28. april om personnavne kan sættes i kraft for Færøerne ved kgl. anordning med de afvigelser som de særlige færøske forhold tilsiger, jfr. lovens § 20, eller

b) der laves en særlig lov for Færøerne om personnavne, jfr. f.eks. de færøske sociallove.

Såvel en kgl. anordning som en særlig lov for Færøerne skal som bekendt have 2 behandlinger i lagtinget. Efter behandlingen i lagtinget sendes sagen gennem landsstyret til rigsmyndighederne. En særlig lov for Færøerne kræver derefter normal behandling i folketinget, medens en kgl. anordning ikke kræver folkatingsbehandling.

Det skal for en ordens skyld bemærkes, at de myndigheder, der efter den gældende navnelovgivning har administrationen af denne her i landet, ikke er blevet hørt om spørgsmålet af de særlige af lagtinget nedsatte udvalg.

En summarisk oversigt over navnelovgivning og administrationen af denne vedlægges.

(÷)

Den nuværende retstilstand vedrørende navnelovgivningen.

**Fornavne**

*I Ved navngivningen/dåben*

*Formelt* gælder reglerne i kirkeministeriets cirkulære af 1. december 1981 indeholdende de godkendte fornavne. Findes et ønsket fornavn ikke i denne fortegnelse, skal spørgsmålet om anvendelse af dette navn forelægges kirkeministeriet. Cirkulæret indeholder kun få færøske fornavne.

I *praksis* følger de færøske præster udover ovennævnte cirkulærer M.A. Jacobsen og Chr. Matras' Føroysk fólkanøvn. Findes navnet ikke i denne fortegnelse, vil præsten, såfremt det drejer sig om et navn af nordisk oprindelse (d.v.s. færøsk, islandsk eller norsk), godkendes navnet evt. først efter drøftelse med biskoppen og/eller en særlig sagkyndig i færøsk. Der sker ingen forelæggelse for kirkeministeriet.

*II Ændring af fornavne*

1) Er der ved navngivningen/dåben sket en fejl f.eks. i stavemåden, forsøges en rettelse af kirkebogen efter de herom gældende regler.
2) Er der ikke sket nogen fejl, så rettelse af kirkebogen kan ske, udfærdiger rigsombudet en bevilling, for fornavnet ændres. Efter reglerne skal dog et af de oprindelige fornavne bevares. Rigsombudet kan dog — og gør dette uden forelæggelse for justitsministeriet (familieretsdirektoratet) — ændre stavemåden for fornavne også selv om det er det eneste oprindelige til det tilsvarende færøske fornavn.

**Efternavn**

*A) Ved navngivningen/dåben*

Børn født i ægteskab får faderens slægtsnavn.
Børn født uden for ægteskab får moderens slægtsnavn, men kan på visse betingelser få faderens.

*B) Ændring af slægtsnavn*

1) Landfogeden kan med justitsministeriets godkendelse under visse særlige forudsætninger ændre et slægtsnavn ved *øvrighedsbevis* efter 1904-lovens § 1, m.fl. Der er kun få sager årligt.

2) Efter 1904-lovens § 6 kan rigsombudet ved *kgl. bevilling* foretage ændring af slægtsnavne.
   a. *Ændring til moderens pigenavn* eller *plejeforældres slægtsnavn* gives af rigsombudet uden forelæggelse for justitsministeriet.
   b. Andre ændringer sker efter forelæggelse for justitsministeriet. Drejer det sig om et *nyt ikke forbeholdt færøsk navn*, forelægger rigsombudet først ønsket for en særlig sagkyndig (tidligere Richard Long, nu Tóarin Evensen) med forespørgsel om, hvorvidt ønsket er i overensstemmelse med færøske sprogbrug og stavemåde.

      Såfremt dette er tilfældet, sender rigsombudet sagen til justitsministeriet med indstilling om, at navneændringen tillades. Normalt godkender justitsministeriet indstillingen med mindre navnet er lig med eller kan forveksles med et allerede forbeholdt navn. Der er i enkelte tilfælde godkendt navne, der er meget lig et tilsvarende dansk forbeholdt navn, såfremt udtalen er væsentlig forskellig. Det beror på en konkret vurdering i hvert enkelt tilfælde.
   c. Ønskes et allerede forbeholdt slægtsnavn eller er det ønskede nye navn meget lig med eller kan forveksles med et allerede *forbeholdt navn* kræves tilladelse af bærerne af det forbeholdte navn for inden kgl. bevilling kan gives.
   d. Under ganske særlige forhold kan et forbeholdt navn gives ved kgl. bevilling, såfremt familien har anvendt navnet gennem alderstid *(navnehævd)*.
   e. Slægtsnavne med endelsen *-dóttir* kan ikke gives efter den gældende retstilstand, derimod kann ikke-forbeholdte slægtsnavne med endelsen *-son* godt gives.

      *Stednavne*, der allerede er forbeholdt, kan ikke gives, jfr. dog ovenfor pkt. 2 c.

**Antal sager**
Gennem de sidste 5 år er antallet af navnesager steget fra 45 årligt til 81 årligt. Antallet af kgl. bevillinger og øvrighedsbevis er i samme tidsrum steget fra 32 til 63.

3/5-1984
*aja*

**Skjal 17 A**

*Skjal til løgtingsmál nr. 100-2:*
*fyrispurningur til løgmann*

Við skrivi frá 17. oktober 1970 greiddi landsstýrið ríkismyndugleikunum frá løgtingssamtyktini frá millumtinganevndini í løgtingsmáli nr. 78/1970: Frágreiðing frá millumtinganevndini í løtingsmáli nr. 78/1968, har heitt var á landsstýrið um at siga ríkisstjórnini frá, at tað sambært løgtingsviðtøku frá 13. apríl 1940 er løgtingsins støða, at Føroyar verða hildnar uttan fyri ósemju landanna millum og hermálsligar samgongur, og at løgtingið sambært løgtingsmál nr. 14/1960 mótmælir, at hermenn verða knýttir at Sornfellis- og Eiðisstøðini og noktar fyri, at krígsútgerð verður goymd á føroyskum land- ella sjóøki.

Eisini varð landsstýrið biðið um at heita á ríkisstýrið at kanna líkindini nú at seta hesar løgtingsviðtøkur í verk.

H. Baunsgaard, táverandi statsministari, svaraði í skrivi frá 1. juli 1971. Viðvíkjandi støðunum á Sornfelli og á Eiði vísir hann til frágreiðing í 1961 frá táverandi statsministara Viggo Kampmann og sigur frá, at síðani tá eru ikki farnar fram broytingar av týdningi. Radarstøðin á Sornfelli, sum er eitt lið í ketuni av radarávaringarstøðum, er relestøð fyri radiosambandið ímillum flogfør yvir Føroyum og flogvøllin í Vágum. Hon er tikin upp í AIP Grønland og Føroyar (radiosambands- og navigatiónshjálp) fyri alla flogferðslu á hesum økjum, og veitir sostatt sivilum flogførum, sum flúgva til Føroyar og Grønlands navigatiónshjálp. Eisini er støðin við í loft- og sjóbjargingartænastuni saman við bjargingarstøðunum í Tórshavn og Keflavík. Støðin hevur hondvápn við lóðuri til at nýta í sambandi við vaktarhald á staðnum. Manningin er ialt 140 mans, harav 19 sivilir, sum allir eru føroyingar.

Loranstøðin á Eiði er heilt sivil og verður rikin av »Fyrvæsenet«. Hon kann nýtast av øllum skipum og flogførum, sum sigla ella flúgva í norðuratlantsøkinum. Loran C systemið kann nýtast av sivilum, og bæði móttakarar og lorankort fáast í frían handli. Harumframt verður loran C nýtt av sjóverjuskipunum við Føroyar, kaðalskipum og havrannsóknarskipum. Manningin er 19 føroyingar undir leiðslu av einum tænastumanni frá »fyrvæsenet«.

Annars ger harra Baunsgaard vart við, at hernaðarspurningar viðvíkja ríkinum sum heild, og mugu viðgerast við hesum í huga. Stjórn-

in hevur tikið samtykt løgtingsins til eftirtektar og vil ávirka, at tey sjónarmiðini, sum løgtingið førir fram, verða ímillum tað tilfar, sum verður lagt til grund fyri politisku og hernaðarligu metingina av trygdarpolitikki Danmarkar.

Til nærri lýsingar av grundarlagnum undir metingini av verjupolitikki Danmarkar er hjáløgd frágreiðing frá juni 1970 frá sakkønari nevnd, sum var sett av ríkisstjórnini.

**Atli P. Dam**
løgmaður

/
/ J. Djurhuus

Til Føroya løgting,
her

**Skjal 17 B**

Føroya Landsstýri
20. okt. 1983

F.L.j.nr. 803-2-100

Løgtingsformaðurin hevur í skrivi frá 5. august 1983 heitt á landsstýrið um at greiða frá, hvør útbúgvingin á støðini á Sornfelli/Mjørkadalur er.

Í skrivinum verður viðmerkt at frágreiðingin verður løgd fyri løgtingið og/ella løgtingsins marknaðarnevnd.

Vísandi hertil verður sagt frá, at Tórshavnar býráð í skrivi frá 11. mai 1983 hevur greitt landsstýrinum frá, at býráðið metir, at umbyggingin (renoveringin) av støðini ikki er ímóti almennu byggisamtyktina fyri økið, har Flyvestation Torshavn ligger, t.v.s. 4. grundøki.

Í samband við hetta rættuliga umfatandi arbeiðið, hevur býráðið samtykt at geva Flyvestation Torshavn loyvi fyribils at seta 3 barakkir upp, ið skulu nýtast hjá arbeiðsfólki, meðan arbeiðið fer fram, og skulu hesar barakkir verða tiknar niður í seinasta lagi 31. mars 1987. Barakkirnar hevur býráðið mett javnbjóðis við arbeiðsskútvognar o.t. og metir sostatt, at tað er ikki ímóti galdandi byggisamtykt at geva loyvi til bygging av teimum.

Býráðið hevur lagt málið fyri landsstýrið við fyrispurningi um landsstýrið kann góðkenna avgerð býráðsins.

Landsstýrið hevur viðgjørt málið sum byggimál, um arbeiðini eru í samsvar við galdandi byggisamtykt, og við skrivi frá 15. juni 1983 svarað, at landsstýrið er samt við býráðnum um, at byggisamtyktin ikki er ímóti, at býráðið gevur loyvi soleiðis sum greitt er frá í nevnda skrivi býráðsins.

Hjálagt er ljósprent av skjølum send landsstýrinum saman við skrivi býráðsins dagfest 11. mai 1983, sum nærri greiða frá hvørjar útbyggingar eru.

**Tórbjørn Poulsen**
landsstýrismaður

/
/ J. Djurhuus

**Føroya Løgting**
att. hr. Jógvan Sundstein,
løgtingsformaður
her

# RED: 10 X



Nasjonalbibliote


**Nasjonalbiblioteket**

National Library of Norway

Rana Division

N-8607 Mo i Rana

Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12